

RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22

LØGTINGS-TIDINDI

1994

LØGTINGSTÍÐINDI 1994

Løgtingstíðindi

1994

Løgtingsmál

Tórshavn 1995

Løgtingstíðindi 1994
© Føroya Løgting
Fyriskipað av løgtingsskrivstovuni

INNIHALDSYVIRLIT

	Ólavsøkutingsetan 1994	1
	Tingnevndir	4
	Frágreiðing frá løgmanni 1994	8
	Farloyvi	20
1	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.	23
2	Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.	30
3	Broyting í arbeiðsloysisskipanini.	32
4	Fíggjarløgtingslógin fyri árið 1.1 - 31.12.1993	33
5	Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.	34
6	Kanning av politisku og umsitingarligu ábyrgdini í samband við skipabygging, veðhald og útgjalding av uppnøggingarstuðuli o.a.	37
7	Ásetan av almannaveitingum.	39
8	Landsstýrismál.	42
9	Ígildissetan fyri Føroyar av kunngerðum viðvíkjandi norðurlanda samstarvinum.	43
10	Broyting í arvagjaldinum.	44
11	Ígildissetan í Føroyum av lóg nr. 266 frá 22. mai 1986 um vaktarvirksemi.	48
12	Ígildissetan fyri Føroyar av lóg um Tann Europeiska Mannarættindasáttmálan.	51
13	Aktivering av avsettum peningi móti tapum í setbúsaskuldini.	52
14	Val av álitismonnum og nevndum.	58
15	Kanningar av marknaðarviðtøkskiftum Føroya mótvegis ES.	59
16	Avtøka av Fíggingargrunninum.	65
17	Javnbjóðis skatting av hjúnum og støkum.	72
18	Áheitan frá ákæruvaldinum sambært § 728a í rættar skipannarlógini.	75
19	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	76
20	Broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.	79
21	Avskriving av setbúsaskuld.	82
22	Lækking í kostnaðinum á heilivági.	84
23	Løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn.	86
24	Kanning av samanleggingini av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka.	89
25	Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn v.m.	112
26	Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om ændring af lov for Færøerne om folkepension og lov for Færøerne om invalidepension m.v. (indførelse af optjeningsbestemmelser)".	117
27	Lóg um heildarveiting til Føroyar.	119
28	Uppskot til samtyktar um fiski- og oljusamvinnu við Noreg.	121
29	Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn.	123
30	Fíggjarløgtingslógin 1995.	125
31	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	185
32	Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.	204

33 Broyting í løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognar-avgjald. 216
34 Broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn. 228
35 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m. 231
36 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. 239
37 Kanning av nøguligum óregluligum politiskum og umsitingarligum avgerðum frá 1980 og framefter. 244
38 Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar. 248
39 Hækking av skattafría botnmarkinum og lækking av skatta-stiganum. 251
40 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 259
41 Stuðulstiltøk til avreiðing og virkan av rávøru her á landi. 262
42 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing. 264
43 Oljuboringar í Lopra. 267
44 Frádráttur fyri ferðing millum heim og arbeiðsstað. 269
45 Skattafrí pensjón. 273
46 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan. 277
47 Broyting í løtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing 278
48 ILO-konventión nr. 169 um upprunafólk og ættarfólk í sjálvstøðugum statum. 298
49 Demokratisering á fjølmiðlaøkinum. 300
50 Sjúkraflutningur úr Nólsoynni. 302
51 Broyting í løgtingslóg um rentuskatt. 305
52 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 311
53 Broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum. 312
54 Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn. 315
55 Broyting í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde". 321
56 Góðkenning av WTO-avtaluni. 323
57 Sparingar og bygnaðarbroytingar í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu . skúla-. almanna- og samskiftisøkinum. 327
58 Ígildissetan fyri Føroyar av §§ 2 og 3 í uppskotinum til "Lov om ændring af retsplejeloven, lov for Færøerne om udgifterne i strafferetsplejen og lov for Færøerne om rettens pleje". 330
59 Handilssáttmálar við Eysturríki og Sveis. 332
60 Viðvíkjandi "Fælleserklæring fra møde den 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre." 335
61 Lántøka til stovnan av framtaksgrunni. 337
62 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 341
63 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m. 352

64 Eykafíggjarløgtingslóg 1994. 362
65 Avtøka av kgl. fyriskipan nr. 392 frá 3. november 1965. 388
66 Løgtingslóg um landskassans innlán og lán í Landsbankanum. 390
67 Løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald. 395
68 Lán til Húsalánsgrunnin. 410
69 Broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti. 412
70 Broyting í løgtingslóg um bjálvingarstuðulslán til pensjónistar. 415
71 Løgtingslóg um bygningarnar hjá Royndarstøðini í Kollafirði. 417
72 Norðurlendskur sáttmáli um sínámillum rættarhjálp. 419
73 Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi. 420
74 Broyting í løgtingslóg um val til Føroya løgting. 424
75 Broyting í fiskivinnuídnaðarmynstrinum. 426
76 Skipan um loyvi at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/Baltisku londunum eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi. 427
77 Skipan millum Føroyar og Baltisku londini um sínamillum fiskirættindi í 1995. 429
78 Skipan millum Føroyar og Russland um sínamillum fiskirættindi í 1995. 431
79 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum. 434
80 Royndarveiða eftir stórhvali. 435
81 Veðurtænasta og fráboðanarskipan fyri útróðrarbátar. 437
82 Broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (Universitas Færoensis). 439
83 Samráðingar um undirgrundarmark. 444
84 Kanningar í samband við skeljaveiðu. 446
85 Ratifikatión av "Montreal-protokollen om stoffer, der nedbryder ozonlaget". 448
86 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sociale ydelser på Færøerne". 450
87 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne", "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse" og "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om embedslægeinstitutioner m.v.". 453
88 Flakavirkisskipanin aftur á privatar hendur. 456
89 Framtíðarstøða Føroya. 460
90 Lýsing av sínámillum peningarenslinum millum Føroyar og Danmark. 463
91 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. 468
92 Uppskot til samtyktar viðvíkjandi Føroya Fiskavirking. 503
93 Lækkan av prísum og hækkan av tænastustøðinum á strandfaraskipunum. 505
94 Broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur. 507
95 Broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya. 511
96 Løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprøvtøku. 513
97 Løgtingslóg um studentaskúlar v.m. 526

98 Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting. 539
99 Avtøka av løgtingslóg um ávísar skúlar. 540
100 Fyrispurningar 810
101 Avtøka av meirvirðisgjaldinum á arbeiðsløntum. 542
102 Tilráðing frá Tingmannaráð Útnorðurs. 545
103 Broyting í løgtingslóg um útvarp. . . . . [illegible]
104 Broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd. 546
105 Broyting í løgtingslóg um sjónvarp. 550
106 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskat. 551
107 Løgtingslóg um eiðarstovnan av íbúðagrunni. 553
108 Lækkan av søluprísinum á drekkimjólk. 555
109 Broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m. 557
110 Skattafrádráttur fyri fiskimenn. 559
111 Íløgustuðul til at roykja fisk og samráðingar við ES um at hækka loftið fyri fisk úr Føroyum og kanna møguleikarnar fyri eini tollunión: Møguleikar fyri 2.250 nýggjum arbeiðsplássum í útflutningsvinnuni. 563
112 Tingskipan Føroya Løgtings. 565
113 Miðvísan landbúnaðarpolitikk í Føroyum fram til ár 2001 og ár 2006 - 5 og 10 ára ætlan á landbúnaðarøkinum. 567
114 Krígsendurgjald fyri føroyingar mynstraðir við útlendskum fiskiskipi. 574
115 Friskúlalóg. 576
116 Stovnsetan av føroyskari viðskiftastovu og setan av føroyskum umboðsmanni í Bruxelles. 582
117 Havbit og loyvi til veiðu við gørnum eftir laksi á firðum og sundum við bátum undir 20 br. reg. tons í august og september. (Møguleikar fyri nýggjum arbeiðsplássum.) 584
118 Útbúgvingarverkið upp til nýggja viðgerð. 586
119 Virðismeting av sethúsum, framd av fíggjareftirlitinum í 1993, og almenna virðisgrundarlagið á sethúsamarknaðinum í Føroyum í 1993 og í dag. 589
120 Samráðingar við donsku stjórnina um útbygging av flogvøllinum í Vágum: Arbeiðsskapandi tiltøk. 592
121 Lækking av skattatrýstinum - lands- og kommunuskattinum. 597
122 Uppsøgn av ES-sáttmálanum, grundað á § 1, stk. a og b. 601
123 Broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya. 604
124 Broyting í løgtingslóg um natúrfriðing. 606
125 Broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning. 607
126 Broyting í løgtingslóg um áseting av telefongjøldum. 609
127 Fyribyrgjan av verkfalls/verkbanns avleiðingum. 610
128 Nýggj fólkatrygging. 612
129 Ígildissetan fyri Føroyar av lóg "om erhvervsfremme". 620
130 Broyting í løgtingslóg um framtaksstovn og uppskot til samtyktar viðvíkjandi framtaksfelag. 621
131 Broyting í løgtingslóg um stuðul til nýggjar vinnur. 625
132 Setan av nevnd at gera uppskot til nýggja kommunala skipan. 630

133 Broyting í ymsum løgtings- og ríkislógum í samband við, at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Landbúnaðarmál). 637
134 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við, at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Fiskiveiðu- og sjóvinnumál). 643
135 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Handilsmál). 646
136 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Ídnaðar- og menningarmál). 648
137 Avtøka av løgtingslóg um keyp av húsaognum. 651
138 Løgtingslóg um lántøku til landskassan og umfígging av landskassaskuld. 652
139 Broyting í løgtingslóg um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovnar. 655
140 Felagslýsingin millum landsstýrið og stjórnina. 658
141 Broytingar í tryggingaravtalulógini. 661
142 Tryggingarlóggávan. 663
143 Broytingar í tryggingarlóggávuni. 665
144 Broyting í ávísum løgtingslógum innan kommunala økið í samband við, at stýrisskipannarlógin fær gildi. 667
145 Broyting í lóg fyri Føroyar um stýri kirkjunnar. 669
146 Broyting í lóg fyri Føroyar um dagpening vegna sjúku og barnsburð. 670
147 Broyting í ymsum lógum innan almanna- og heilsuøkið. 672
148 Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna. 674
149 Broyting í løgtingslóg um tænastumenn landsins. 676
150 Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir. 678
151 Skipan millum Føroyar og Ísland um sínámillum fiskirættindi í 1995. 680
152 Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1995. 682
153 Skipan Føroya og ES millum um sínámillum fiskirættindi í 1995. 683
154 Øktir inntøkumøguleikar ájá sethúsacigarum frá ferðavinnuni. 689
155 Ungdómsarbeiði við fornminnum til ferðavinnuna. 692
156 Ognar- og yvirvaldsrættur yvir havleiðum utan fyri 200 fjórðinga fiski- og búskaparmørk. 694
157 Afturgjalding av sethúsaskuld. 698
158 Minstamark fyri MVG-skráseting av føroyskum framleiðsluvirkjum. 701
159 Broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum. 703
160 Broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutnin 706
161 Avtøka av løgtingslóg um karensdagar. 708
162 Avtøka av ymsum løgtingslógum (Ídnaðar- og menningarmál). 711
163 Broyting í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt. 712
164 Navnalógin endurskoðast. 714
165 Útsetan av ferð Nyrup Rasmussens til Føroya vegna ósemju um dómarakanning av bankamálinum og kreppu landanna millum. 716

166 Eitt útvarps- og sjónvarpsgjald fyri hvørt húski. 717
167 Løgtingslóg um búskaparráð. 718
168 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. 724
169 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 725
170 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning. 728
171 Stovnsetan av einum nyggjum føroyskum banka. 728
172 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 730
173 Løgtingslóg um at avmarka møguleikarnar hjá skuldarum at taka lut í almennum úthjóðingum. 732
174 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. 739
175 Uppsøgn av avtalunum við danir og skattafatta til øli. 749
176 Breyð undantikið MVG (meirvirðisgjaldi). 751
177 Avtøka av MVG (meirvirðisgjaldi) á sjómannaheimum og hotellum/matstovum, sum hava ikki skeinkiloyvi. 753
178 Kanning av bankamálinum. 754
179 Løgtingslóg um stuðul til flutning av fiski. 768
180 Broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn. 770
181 Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. 775
182 Broyting í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan. 776
183 Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu. 779
184 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 781
185 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan. 787
186 Broyting í løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald. 792
187 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 795
188 Løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprøvtøku v.m. 797

Fyrispurningar

100-
1 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, um ætlan landsstýrisins um ES-kanningar. (Tórður J. Niclasen) 810
2 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi heilsuverki Føroya. (Jenis av Rana) 813
3 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi flakavirkinum í Vági. (Jákup Olsen) 815
4 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi ábyrgdini av umsitingini í almannamálum. 817
5 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi viðgerðartíðini av kærum í almannamálum. (Kristian Magnussen). 817
6 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi sparingum og bygnaðarbroytingum í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. (Jákup Olsen) 819
7 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi avmonteringini av føroysku høvuðsvinnuni.

(Bjarni Djurholm) 821
8 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðvíkjandi analfabetismu í Føroyum. (Óli Breckmann) 825
9 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi felags kvotuni hjá útróðrarbátum yvir 20 brt. (Jákup Olsen) 826
10 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðvíkjandi uppsøgnum av fólki í Akrabergi (Jákup Olsen). 828
11 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðvíkjandi Rás Tórshavn. (Finnbogi Ísakson) 829
12 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. kommunulæknaskipanini í Føroyum. (Eliesar Høj) 832
13 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi seismisku kanningunum, sum verða gjørdar við Føroyar. (John Petersen) 834
14 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðvíkjandi teknisku skúlunum. (Álvur Zachariassen) 837
15 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi fundinum 23. januar 1995 við umboð fyri A. P. Møller o.o. (Vilhelm Johannesen) 840
16 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. farloyvisgrunni. (Tordur J. Niclasen) 844
17 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi tolleftirlitinum á flogvøllinum. (Tordur J. Niclasen) 846
18 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi skeljaveiðu, havbotninum og øðrum veiðihættum. (Jákup Olsen) 849
19 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi kanningini av møguleikunum fyri aktivering av avsettum peningi at lætta um fíggjarstøðuna hjá sethúsacigarunum. (Bjarni Djurholm) 852
20 Fyrispurningur til Bent Klinte, ríkisumboðsmann, viðv. Føroyabólkinum ("Færøgruppen") (Finnbogi Ísakson). 853
21 Fyrispurningur til Óla Jacobsen, landsstýrismann, viðv. lógini um etiskt ráð og regulering av biomedisinskari gransking. (Lasse Klein) 856
22 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, um møguleikar hjá Føroyum at fáa part av tí gjaldi, ið flogfør rinda, sum flúgva í føroyskum loftrúmi, og um møguleikarnar hjá føroyingum at átaka sær eftirlitið við flogferðsluni í føroyska loftrúminum. (Signar á Brúnni) 858

EVNISYVIRLIT

1994

Almannamál

7 Ásetan av almannaveitingum. 39
26 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om ændring af lov for Færøerne om folkepension og lov for Færøerne om invalidepension m.v. (indførelse af optjeningsbestemmelser)". 117
38 Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar. 248
50 Sjúkraflutningur úr Nólsoynni. 302
57 Sparingar og bygnaðarbroytingar í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. 327
86 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sociale ydelser på Færøerne". 450
114 Krígsendurgjald fyri føroyingar mynstraðir við útlendskum fiskiskipi. 574
146 Broyting í lóg fyri Føroyar um dagpening vegna sjúku og barnsburð. 670
147 Broyting í ymsum lógum innan almanna- og heilsuøkið. 672
159 Broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum. 703
100-4 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi ábyrgdini av umsitingini í almannamálum. 817
100-5 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi viðgerðartíðini av kærum í almannamálum. (Kristian Magnussen). 817
100-6 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi sparingum og bygnaðarbroytingum í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. (Jákup Olsen) 819

Arbeiðaramál

3 Broyting í arbeiðsloysisskipanini. 32
25 Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn v.m. 112
29 Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn. 123
42 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing. 264
47 Broyting í løtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing 278
127 Fyribyrgjan av verkfalls/verkbanns avleiðingum. 610
161 Avtøka av løgtingslóg um karensdagar. 708
168 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. 724
100-16 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. farloyvisgrunni. (Tordur J. Niclasen) 844

Ferðavinnumál

154 Øktir inntøkumøguleikar hjá sethúsaeigarum frá ferðavinnuni. 689
155 Ungdómsarbeiði við fornminnum til ferðavinnuna. 692

Fiski- og onnur sjóvinna

1 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. 23
23 Løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn. 86
28 Uppskot til samtyktar um fiski- og oljusamvinnu við Noreg. 121
41 Stuðulstiltøk til avreiðing og virkan av rávøru her á landi. 262
54 Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn. 315
73 Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi. 420
75 Broyting í fiskivinnuídnaðarmynstrinum. 426
76 Skipan um loyvi at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/Baltisku londunum eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi. 427
77 Skipan millum Føroyar og Baltisku londini um sínamillum fiskirættindi í 1995. 429
78 Skipan millum Føroyar og Russland um sínamillum fiskirættindi í 1995. 431
80 Royndarveiða eftir stórhvali. 435
81 Veðurtænasta og fráboðanarskipan fyri útróðrarbátar. 437
84 Kanningar í samband við skeljaveiðu. 446
88 Flakavirkisskipanin aftur á privatar hendur. 456
91 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. 468
92 Uppskot til samtyktar viðvíkjandi Føroya Fiskavirking. 503
110 Skattafrádráttur fyri fiskimenn. 559
111 Íløgustuðul til at roykja fisk og samráðingar við ES um at hækka loftið fyri fisk úr Føroyum og kanna møguleikarnar fyri eini tollunión: Møguleikar fyri 2.250 nýggjum arbeiðsplássum í útflutningsvinnuni. 563
117 Havbit og loyvi til veiðu við gørnum eftir laksi á firðum og sundum við bátum undir 20 br. reg. tons í august og september. (Møguleikar fyri nýggjum arbeiðsplássum.) 584
134 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við, at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Fiskiveiðu- og sjóvinnumál). 643
151 Skipan millum Føroyar og Ísland um sínámillum fiskirættindi í 1995. 680
152 Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1995. 682
153 Skipan Føroya og ES millum um sínámillum fiskirættindi í 1995. 683
170 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning. 728
179 Løgtingslóg um stuðul til flutning av fiski. 768
181 Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. 775

182 Broyting í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan. 776
100-3 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi flakavirkinum í Vági. (Jákup Olsen) 815
100-7 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi avmonteringini av føroysku høvuðsvinnuni. (Bjarni Djurholm) 821
100-9 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi felags kvotuni hjá útróðrarbátum yvir 20 brt. (Jákup Olsen) 826
100-18 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi skeljaveiðu, havbotninum og øðrum veiðihættum. (Jákup Olsen) 849

Fíggjarmál

2 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. 30
4 Fíggjarløgtingslógin fyri árið 1.1 - 31.12.1993 33
5 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. 34
13 Aktivering av avsettum peningi móti tapum í sethúsaskuldini 52
16 Avtøka av Fíggingargrunninum. 65
17 Javnbjóðis skatting av hjúnum og støkuni. 72
19 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 76
20 Broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju. 79
21 Avskriving av sethúsaskuld. 82
22 Lækking av søluprísinum á heilivági 84
27 Lóg um heildarveiting til Føroyar. 119
30 Fíggjarløgtingslógin 1995. 125
31 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 185
32 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan. 204
33 Broyting í løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognar-avgjald. 216
34 Broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn. 228
35 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m. 231
36 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. 239
39 Hækking av skattafría botnmarkinum og lækking av skatta-stiganum. 251
40 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 259
44 Frádráttur fyri ferðing millum heim og arbeiðsstað. 269
45 Skattafrí pensjón. 273
46 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan. 277
51 Broyting í løgtingslóg um rentuskatt. 305
52 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 311
53 Broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum. 312
60 Viðvíkjandi "Fælleserklæring fra møde den 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre." 335
61 Lántøka til stovnan av framtaksgrunni. 337

62 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 341
63 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m. 352
64 Eykafíggjarløgtingslóg 1994. 362

67 Løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald. 395
68 Lán til Húsalánsgrunnin. 410
70 Broyting í løgtingslóg um bjálvingarstuðulslán til pensjónistar. 415
79 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum. 434
90 Lýsing av sínámilium peningarenslinum millum Føroyar og Danmark. 463
94 Broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur. 507
95 Broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya. 511
101 Avtøka av meirvirðisgjaldinum á arbeiðslønum. 542
106 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 551
107 Løgtingslóg um endurstovnan av íbúðagrunni. 553
109 Broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m. 557
119 Virðismeting av sethúsum, framd av fíggjareftirlitinum í 1993, og almenna virðisgrundarlagið á sethúsamarknaðinum í Føroyum í 1993 og í dag. 589
121 Lækking av skattatrýstinum - lands- og kommunuskattinum. 597
130 Broyting í løgtingslóg um framtaksstovn og uppskot til samtyktar viðvíkjandi framtaksfelag. 621
131 Broyting í løgtingslóg um stuðul til nýggjar vinnur. 625
137 Avtøka av løgtingslóg um keyp av húsaognum. 651
138 Løgtingslóg um lántøku til landskassan og umfígging av landskassaskuld. 652
139 Broyting í løgtingslóg um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovnar. 655
140 Felagslýsingin millum landsstýrið og stjórnina. 658
157 Afturgjalding av sethúsaskuld. 698
158 Minstamark fyri MVG-skráseting av føroyskum framleiðsluvirkj 701
160 Broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning706
163 Broyting í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt. 712
167 Løgtingslóg um búskaparráð. 718
169 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 725
171 Stovnsetan av einum nýggjum føroyskum banka. 728
172 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. 730
173 Løgtingslóg um at avmarka møguleikarnar hjá skuldarum at taka lut í almennum útbjóðingum. 732
174 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. 739
175 Uppsøgn av avtalunum við danir og skattalætta til øll. 749
176 Breyð undantikið MVG (meirvirðisgjaldi). 751
177 Avtøka av MVG (meirvirðisgjaldi) á sjómannaheimum og hotellum/

	matstovum, sum hava ikki skeinkiloyvi.	753
180	Broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn.	770
184	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	781
185	Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.	787
186	Broyting í løgtingslóg um renduavgjald og fíggjarognaravgjald.	792
187	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	795
100-19	Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi kanningini av møguleikunum fyri aktivering av avsettum peningi at lætta um fíggjarstøðuna hjá setbúsacigarunum. (Bjarni Djurholm)	852

Fyrispurningar

100-1	Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, um ætlan landsstýrisins um ES-kanningar. (Tordur J. Niclasen)	810
2	Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi heilsuverki Føroya. (Jenis av Rana)	813
3	Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi flakavirkinum í Vági. (Jákup Olsen)	815
4	Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi ábyrgdini av umsitingini í almannamálum.	817
5	Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi viðgerðartíðini av kærum í almannamálum. (Kristian Magnussen).	817
6	Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi sparingum og bygnaðarbroytingum í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. (Jákup Olsen)	819
7	Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi avmonteringini av føroysku høvuðsvinnuni. (Bjarni Djurholm)	821
8	Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðvíkjandi analfabetismu í Føroyum. (Óli Breckmann)	825
9	Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi felags kvoturi hjá útróðrarbátum yvir 20 brt. (Jákup Olsen)	826
10	Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðvíkjandi uppsøgnum av fólki í Akrabergi (Jákup Olsen).	828
11	Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðvíkjandi Rás Tórshavn. (Finnbogi Ísakson)	829
12	Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. kommunulæknaskipanini í Føroyum. (Eliesar Høj)	832
13	Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi seismisku kanningunum, sum verða gjørdar við Føroyar. (John Petersen)	834
14	Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðvíkjandi teknisku skúlunum. (Álvur Zachariassen)	837

15 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi fundinum 23. januar 1995 við umboð fyri A. P. Møller o.a. (Vilhelm Johannesen) 840
16 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. farloyvisgrunni. (Tordur J. Niclasen) 844
17 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi tolleftirlitinum á flogvøllinum. (Tordur J. Niclasen) 846
18 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi skeljaveiðu, havbotninum og øðrum veiðihættum. (Jákup Olsen) 849
19 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi kanningini av møguleikunum fyri aktivering av avsettum peningi at lætta um fíggjarstøðuna hjá sethúsaeigarunum. (Bjarni Djurholm) 852
20 Fyrispurningur til Bent Klinte, ríkisumboðsmann, viðv. Føroyabólkinum ("Færøgruppen") (Finnbogi Ísakson). 853
21 Fyrispurningur til Óla Jacobsen, landsstýrismann, viðv. lógini um etiskt ráð og regulering av biomedisinskari gransking. (Lasse Klein) 856
22 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, um møguleikar hjá Føroyum at fáa part av tí gjaldi, ið flogfør rinda, sum flúgva í føroyskum loftrúmi, og um møguleikarnar hjá føroyingum at átaka sær eftirlitið við flogferðsluni í føroyska loftrúminum. (Signar á Brúnni) 858

Heilsumál

22 Lækking av søluprísinum á heilivági 84
57 Sparingar og bygnaðarbroytingar í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. 327
87 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne", "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse" og "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om embedslægeinstitutioner m.v.". 453
147 Broyting í ymsum lógum innan almanna- og heilsuøkið. 672
100-2 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi heilsuverki Føroya. (Jenis av Rana) 813
100-6 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi sparingum og bygnaðarbroytingum í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. (Jákup Olsen) 819
100-12 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. kommunulæknaskipanini í Føroyum. (Eliesar Høj) 832
100-21 Fyrispurningur til Óla Jacobsen, landsstýrismann, viðv. lógini um etiskt ráð og regulering av biomedisinskari gransking. (Lasse Klein) 856

Kommunumál

132 Setan av nevnd at gera uppskot til nýggja kommunala skipan. 630
144 Broyting í ávísum løgtingslógum innan kommunala økið
í samband við, at stýrisskipannarlógin fær gildi. 667

Landbúnaðarmál og djór

71 Løgtingslóg um bygningarnar hjá Royndarstøðini í Kollafirði. 417
108 Lækkan av søluprísinum á drekkimjólk. 555
113 Miðvísan landbúnaðarpolitikk í Føroyum fram til ár 2001
og ár 2006 - 5 og 10 ára ætlan á landbúnaðarøkinum. 567
133 Broyting í ymsum løgtings- og ríkislógum í samband við,
at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Landbúnaðarmál). 637

Landsstýri

8 Landsstýrismál. 42
148 Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn
landsstýrismanna. 674

Lán og lániábyrgdir

66 Løgtingslóg um landskassans innlán og lán í Landsbankanum. 390
138 Løgtingslóg um lántøku til landskassan og umfígging
av landskassaskuld. 652
139 Broyting í løgtingslóg um endurfígging av lánum til
landskassan og landsstovnar. 655
183 Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi
v.m. á goymslu. 779

Løgtingið

74 Broyting í løgtingslóg um val til Føroya løgting. 424
112 Tingskipan Føroya Løgtings. 565

Mentannarmál

145 Broyting í lóg fyri Føroyar um stýri kirkjunnar. 669

Nevndir og álitisfólk

14 Val av álitismonnum og nevndum. 58

Norðurlandamál

9 Ígildissetan fyri Føroyar av kunngerðum viðvíkjandi norðurlanda samstarvinum. 43
102 Tilráðing frá Tingmannaráð Útnorðurs. 545

Rættarmál

6 Kanning av politisku og umsitingarligu ábyrgdini í samband við skipabygging, veðhald og útgjalding av upphøggingarstuðuli o.a. 37
10 Broyting í arvagjaldinum. 44
11 Ígildissetan í Føroyum av lóg nr. 266 frá 22. mai 1986 um vaktarvirksemi. 48
12 Ígildissetan fyri Føroyar av lóg um Tann Europeiska Mannarættindasáttmálan. 51
18 Áheitan frá ákæruvaldinum sambært § 728a í rættarskipannarlógini. 75
24 Kanning av samanleggingini av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka. 89
37 Kanning av møguligum óregluligum politiskum og umsitingarligum avgerðum frá 1980 og frameftir. 244
48 ILO-konvention nr. 169 um upprunafólk og ættarfólk í sjálvstøðugum statum. 298
58 Ígildissetan fyri Føroyar av §§ 2 og 3 í uppskotinum til "Lov om ændring af retsplejeloven, lov for Færøerne om udgifterne i strafferetsplejen og lov for Færøerne om rettens pleje". 330
65 Avtøka av kgl. fyriskipan nr. 392 frá 3. november 1965. 388
72 Norðurlendskur sáttmáli um sínámillum rættarhjálp. 419
89 Framtíðarstøða Føroya. 460
133 Broyting í ymsum løgtings- og ríkislógum í samband við, at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Landbúnaðarmál). 637
134 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við, at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Fiskiveiðu- og sjóvinnumál). 643
135 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Handilsmál). 646
136 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Ídnaðar- og menningarmál). 648
156 Ognar- og yvirvaldsrættur yvir havleiðum uttan fyri 200 fjórðinga fiski- og búskaparmørk. 694
162 Avtøka av ymsum løgtingslógum (Ídnaðar- og menningarmál). 711
164 Navnalógin endurskoðast. 714
165 Útsetan av ferð Nyrup Rasmussens til Føroya vegna ósemju um dómarakanning av bankamálinum og kreppu landanna millum. 716
178 Kanning av bankamálinum. 754

Samferðslumál

93 Lækkan av prísum og hækkan av tænastustøðinum á strandfaraskipunum. 505
120 Samráðingar við dansku stjórnina um útbygging av flogvøtlinum í Vágum: Arbeiðsskapandi tiltøk. 592
125 Broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning. 607
100-22 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, um møguleikar hjá Føroyum at fáa part av tí gjaldi, ið flogfør rinda, sum flúgva í føroyskum loftrúmi, og um møguleikarnar hjá føroyingum at átaka sær eftirlitið við flogferðsluni í føroyska loftrúminum. (Signar á Brúnni) 858

Samskiftismál

57 Sparingar og bygnaðarbroytingar í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. 327
123 Broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya. 604
126 Broyting í løgtingslóg um áseting av telefongjøldum. 609
100-6 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi sparingum og bygnaðarbroytingum í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. (Jákup Olsen) 819

Trygging

55 Broyting í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde". 321
128 Nýggj fólkatrygging. 612
141 Broytingar í tryggingaravtalulógini. 661
142 Tryggingarlóggávan. 663
143 Broytingar í tryggingarlóggávuni. 665

Tænastumenn

149 Broyting í løgtingslóg um tænastumenn landsins. 676
150 Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir. 678

Umhvørvismál

85 Ratifikatión av "Montreal-protokollen om stoffer, der nedbryder ozonlaget". 448
124 Broyting í løgtingslóg um natúrfriðing. 606

Undirvísingarmál

57 Sparingar og bygnaðarbroytingar í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. 327
69 Broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti. 412
82 Broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (Universitas Færoensis). 439
96 Løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprøvtøku. 513
97 Løgtingslóg um studentaskúlar v.m. 526
98 Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting. 539
99 Avtøka av løgtingslóg um ávísar skálar. 540
115 Friskúlalóg. 576
118 Útbúgvingarverkið upp til nýggja viðgerð. 586
188 Løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprøvtøku v.m. 797
100-6 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi sparingum og bygnaðarbroytingum í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum. (Jákup Olsen) 819
100-8 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðvíkjandi analfabetismu í Føroyum. (Óli Breckmann) 825
100-14 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðvíkjandi teknisku skúlunum. (Álvur Zachariassen) 837

Uttanríkismál

15 Kanningar av marknaðarviðurskiftum Føroya mótvegis ES. 59
56 Góðkenning av WTO-avtaluni. 323
83 Samráðingar um undirgrundarmark. 444
116 Stovnsetan av føroyskari viðskiftastovu og setan av føroyskum umboðsmanni í Bruxelles. 582
122 Uppsøgn av ES-sáttmálanum, grundað á § 1. stk. a og b. 601
100-1 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, um ætlan landsstýrisins um ES-kanningar. (Tordur J. Niclasen) 810

Útvarp og sjónvarp

49 Demokratiscring á fjølmiðlaøkinum. 300
103 Broyting í løgtingslóg um útvarp. 545
104 Broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd. 548
105 Broyting í løgtingslóg um sjónvarp. 550
166 Eitt útvarps- og sjónvarpsgjald fyri hvørt húski. 717
100-11 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðvíkjandi Rás Tórshavn. (Finnbogi Ísakson) 829

Vinnumál

15 Kanningar av marknaðarviðurskiftum Føroya mótvegis ES. 59
28 Uppskot til samtyktar um fiski- og oljusamvinnu við Noreg. 121

43 Oljuboringar í Lopra. 267
59 Handilssáttmálar við Eysturríki og Sveis. 332

94 Broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur. 507
129 Ígildissetan fyri Føroyar av lóg "om erhvervsfremme". 620
130 Broyting í løgtingslóg um framtaksstovn og uppskot til samtyktar viðvíkjandi framtakstelag 621
131 Broyting í løgtingslóg um stuðul til nýggjar vinnur. 625
135 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Handilsmál). 646
136 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Ídnaðar- og menningarmál). 648
158 Minstamark fyri MVG-skráseting av føroyskum framleiðsluvirkjum. 701
160 Broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi. 706
162 Avtøka av ymsum løgtingslógum (Ídnaðar- og menningarmál). 711
173 Løgtingslóg um at avmarka møguleikarnar hjá skuldarum at taka lut í almennum útbjóðingum 732

NB! Møgulig fylgiskjøl til málini eru til taks á løgtingsskrivstovuni.

Nr.	Málið	Framlagt Dato	av	1. viðgerð	Nevnd	Alitið	2. viðgerð	3. viðgerð	atkvøðugreiðsla	Avgreitt	Lóg nr.
1	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.	3-Aug.	FL	5-Aug	Fiskivinnunevnd	10-Aug.	10-Aug. 22-0	10-Aug	21-0	7-Sept.	105,24-Aug.-94
2	Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.	3-Aug.	FL	5-Aug			10-Aug 27-0	10-Aug	26-0	25-Aug.	104,16/8-94
3	Broyting í arbeiðsloysisskipanini.	3-Aug.	Sj.f og VF.	5-Aug	Fíggjarnevnd	10-Nov	11-Nov afturtikið.			21-Nov.	
4.	Fíggjarløgtingslóg fyri árið 1. januar til 31. desember 1993		FL								-
5	Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.	19-Sept.	Folkatl.	18-Okt	Skattanevnd	2-Des	5-Des		7-0	7-Des.	-
6	Kanning av pollisku og umsitingarligu ábyrgdini í samband við skipabygging veðhald og útgjalding av uppheggingarstuðli o.a.	8 Nov.	KFF	24-Nov	Rætturnevnd	24-Mai	31-Mai afturtikið			28-Jun.	
7	Ásetan av almannaveitingum.	18-Okt.	FL	21-Okt	Alm. og heilsun.	10-Nov	11-Nov 21-0	22-Nov.	23-0	13-Des	117,2/12-94
8	Landsstýrismál.	18-Okt	F.		Landssl. málan.	31-Mai	1-Jun		29-0	21-Jun	
9	Ígildissetan fyri Føroyar av kunngerðum viðvikjandi norðurlandasamstarvinum.	18-Okt	FL	28-Okt			8-Nov		29-0	21-Nov.	
10	Broyting í arvaavgjaldinum.	5-Des	FL	9-Des	Skattanevnd	21-Des	2-Jan 18-0 aftur í Skattanevnd				
11	Ígildissetan í Føroyum av lóg nr. 266 frá 22. mai 1986 um vaktarvirksemi.	18-Okt.	FL	21-Okt	Rætturnevnd	17-Febr.	9-Mar 31-0		30-0	13-Mar.	
12	Ígildissetan fyri Føroyar av lóg um Tann Europeiska Mannarættindasáttmálan.	18-Okt.	FL	21-Okt	Rætturnevnd	21-Des	2-Jan		29-0	5-Jan.	
13	Aktivering av avsettum peningi móti tapum í sethúsaskuldini.	18 Okt.	Folkatl.	27-Okt	Fíggjarnevnd	10-Nov	22-Nov 25-0		25-0	1-Des	
14	Val av alltingsmonnum og nevndum.	18-Okt.	Løgt.form.	21-Okt							
15	Kanningar av marknaðarviðurskiftum Føroya móttvegis ES.	21-Okt.	Folkatl	28 Okt	Marknaðarnevnd	18 Apr	27-Apr. atkv.gr. útsett		JD 8-0 JR 6-0 uppr. 7-0	4-Mai.	

16	Avtøka av figgingargrunninum	27-Okt.	Fólkafl.	8-Nov	Figgjarnevnd	31-Jan.	2-Feb		5-0 levnd 26-0	7-Febr.	
17	Javnbjóðis skatting av hjúnum og støkum.	27-Okt.	Fólkafl.	8-Nov	Skattánevnd	24-Nov.	29-Nov		7-0 20-0	1-Des.	
18	Áheitan frá ákærvaldinum sambært § 728 a í rættargangslógini.	18-Okt.	Formanssk.	21-Okt			27-Okt		20-0	21-Nov.	
19	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	18-Okt.	KFFF	27-Okt	Skattanevnd	17-Febr.	23-Feb 4-0		28-0 nevnd	1-Mar.	
20	Broyting í løgtingslóg um serligt av gjald á brennioljú.	18-Okt.	KFFF	27-Okt	Figgjarnevnd	10-23-Nov.	11-29-Nov skattanevnd		7-0	1-Des.	
21	Avskriving av setnúsaskuld.	18-Okt.	KFFF	27-Okt	Figgjarnevnd	10-Nov	22-Nov afturtikið			28-Nov.	
22	Lækking av kostnaðinum á heilivági.	18 Okt.	M-ófl.	27-Okt.	Skattanevnd	23-Nov.	29-Nov.		7-0 20-0	1-Des.	
23	Løgtingslóg um mánaðarligan minsta forvinning til skrásettar útróðrarmenn.	21-Okt.	Tjóðv.	10-Nov.	Fiskivinnunevnd					ikki avgreitt	
24	Kanning av samanleggingini av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka.	8-Des	Fólkafl.	19-Des	Rættarnevnd	16-Jan	19-Jan aftur í nevnd		isk. 31-0 isk. 31-0 uts 30-0	20-Jan.	
25	Broyting í løgtingslóg um fritíð við løn v.m.	29-Nov	FL	8-Des	Arb.málanevnd	4-Des-31Jan. 23-Feb.	19-Des állt lit	22/12-31/1 aftur í nevnd 2-Febr.	2-Feb u.t.s. 21-0 22-0	1-Mai.	40,14-Mar. 95
26	Igildissetan fyri Føroyar av "Lov om ændring af lov for Færøerne om fólkepension og lov for Færøerne om invalidepension m.v (udførelse af optjeningsbestemmelser).	29-Nov	FL	2-Des	A.m. og heilsun.	5-Des	8-Des		18 0	13/12/94	
27	Lóg um heildarveiting til Føroyar.	29-Nov	FL	2-Des	Figgjarnevnd	8-Des	9-Des		25-0	9/12/94	
28	Uppskot til samtyktar um fiska- og oljusamvinnu við N[illegible]	2-Des	J.Petersen Ó.Breckmann	14-Des	Marknaðarnevnd	16-Apr	27-Apr Afturtikið			1-Mai.	
29	Broyting í løgtingslóg um fritíð við løn.		Fólkafl	16-Jan	Arb.málanevnd	17-Mai	22-Mai		3-0	28-Jun	
30	Figgjarløgtingslóg in 1995 (onnur	2-Des	FL	8-9-Des	Figgjarnevnd	19-Des	21-Des	22-Des.	29-0	5-Jan.	127,22-Des 94

	framlegaj.						30-0				
31	Broyting í løgtingslóg um landsskat og kommunuskatt	2-Des	FL	5-Des	Skattanevnd	19-Des.	21-Des 21-0	2-Jan	22-0	18-Jan.	4.12-des. 95
32	Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.	2-Des	FL	5-Des	Skattanevnd	19-Des	21-Des 22-0	22-Des.	25-0	17-Jan.	2.3-Jan 95
33	Broyting í løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald.		FL	5-Des	Skattanevnd	21-Des	Málið afturtikið				
34	Broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn.	9-Des	FL	14-Des	Rættarnevnd	17-Feb	9-Mar. Ippsk at beina málið í Idnaðn. 14-0		12-0	13-Mar.	
35	Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m	22-Nov	Ó. Breckm	29-Nov	Skattanevnd	17-Feb	23-Feb afturtikið			1-Mar.	
36	Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.	2-Des	FL	5-Des	Skattanevnd	19-Des	21-Des 21-0	22-Des	31-0	30-Des.	125.22-Des.94
37	Kanning av møguligum óregluligum politiskum og umsitingarligum avgerðum frá 1960 og framettir.	27-Jan	Rættarnevnd	17-Feb	Rættarnevnd	1-Jun	1-Jun		18-0	29-Jun.	
38	Løgtingslóg um brenni- og samskiltisstudning til ávísar pensjónistar.	21-Okt	FL	27-Okt	Alm. og heilsun.	28-Okt álit II 10/11	8-Nov 28-0	10-10-Nov aftur í alm og heilsun.	24-0	29-Nov.	113.22-Nov.94
39	Hækking av skattafria botnmarkinum og lækking av skattastiganum.	10-Nov	Ó.Breckm	29-Nov	Skattanevndin	24-Mei	1-Jun		8-0	28-Jun	
40	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	27-Okt	KFFF	8-Nov	skattanevnd	17-Feb	23-Feb		8-0 u.t.s 28-0	1-Mar.	
41	Stuðulstiltøk til avreiðing og virkan av rávøru her á landi.	21-Okt	T. Niclansen	28-Okt	Ídnaðarnevnd	21-Des	16-Jan		10-0	19-Jan.	
42	Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.	14-Des	FL	19-Des	Arb.málanevnd	21-Des	22-Des	22-Des	22-0	30-Des	126,22-Des.94
43	Oljuborðingar í Løpra	28-Okt	KFFF	23-Nov	Ídnaðarnevnd	21-Des	16-Jan		10-0	19-Jan.	
44	Fradrattir fyri ferðing millum heim og arbeiðsstað.	8-Nov	KFFF	8-Des	Skattanevnd	17-Feb	23-Feb		7-0	28-Febr	

45	Skattafri pensjón	10-Nov	KFFF	2-Des	Skattanevnd	17-Feb	23-Feb		7-0	1-Mar.	
46	Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.	10-Nov	KFFF	2-Des	Skattanevnd	17-Feb	23-Feb Afturtikið			1-Mar.	
47	Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávising.	8-Nov	FL	10-Nov	Arb. málanevnd	22-Nov	24-Nov 23-0	24-Nov	22-0	1-Des.	114,25-Nov. 94
48	ILO-konventión nr. 169 um upprunafólk og ættarfólk í sjálvstøðugum statum.	8-Nov	FL	10-Nov	Marknaðarnevnd	29-Nov	2-Des.		27-0	6 Des.	
49	Demokratisering á fjarmiðlaøkinum	8-Nov	Miðfl.	23-Nov	Ment.og skólan.	21-Des	9-Mar 11-0		u.t.s.29-0	10-Mar.	
50	Sjúkraflutningur úr Nólsoynni.	8-Nov	Miðfl.	24-Nov	Atm. og heilsun.	18-Apr	20-Apr		7-0 nevnd23-0	4-Mai.	
51	Broyting í løgtingslóg um rentuskatt	8-Nov	FL	10 Nov	Skattanevnd	29-Nov	2-Des 20-0	5-Des.	17-0	29-Des.	120,13 Des.-94
52	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	8-Nov	FL	10-Nov	Skattanevnd	29-Nov	2-Des 20-0	5-Des.	17-0	29-Des.	121,13-Des -94
53	Broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrævum	8-Nov	FL	10-Nov	Skattanevnd	29-Nov	2-Des 20-0	5-Des	17-0	28-Des.	122,13-Des.94
54	Løgtingslóg um minsluten til útróðrarmenn.	8-Nov	FL	10-Nov	Fiskivinnunevnd	11-Nov	22-Nov 28-0	24-Nov.	25-0	1-Des.	116,25-Nov.94
55	Broyting í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde"	10-Nov	FL	24-Nov	Atm.og heilsun.	24-Jan	27-Jan 28-0	31-Jan	28-0	23-Feb	30,14-Nov.95
56	Góðkenning av WTO-avtaluni.	10-Nov	FL	22-Nov	Marknaðarnevnd	2-Des	5-Des		27-0	6-Des.	
57	Sparingar og bygnaðarbroytingar í avtaluni frá 12. okt 1993 á heilsu-, skúla-,almanna og samskiftisøkinum.	10-Nov	KFFF	24-Nov	Figgjarnevnd	24-Jan	27-Jan		8-0	7-Des.	
58	Ígildisseran fyri Føroyar av §§ 2 og 3 í uppskotinum til "Lov om ændring af retsplejeloven, lov for Færøerne om udgifterne i strafeloven og lov for Færøerne om rettens pleje".	10-Nov	FL	23-Nov	Rættarnevnd		6-Jan.		19-0	17-Jan	

59	Handilssáttmáli millum Eystur-riki og Sveis.	22-Nov	FL	29-Nov	Marknaðarnevnd	19-Des.	21-Des		28-0	30-Des.		
60	Viðviklandi "Fælleserklæring fra møde den 17. nov 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre".	25-Nov	T.Niclasen	2-Des	Marknaðarnevnd	2-Jan	14-Feb		23-0	18-Febr.		
61	Lánteka til stovnan av framtaks-grunni.	19-Des	FL	21-Des.	Fíggjarnevnd	22-Des.	22-Des. attur í fíggjn.	22-Des.	26-0	17-Jan	1,3.Jan-95	
62	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt	22-Des	FL	2-Jan	Skattanevnd	19-Jan	24-Jan I 30-0 II 29-0	27-Jan	26-0	7-Febr.	16 og 17 1/2 95	
63	Broyting í løgtingslóg um skráset-ingargjald av motorakturum v.m.	22-Des	FL	2-Jan	Skattanevnd	16-Jan	19-Jan 31-0	24-Jan. br 22-0	25-1	7-Febr	14,1-Febr.95	
64	Eykafíggjarløgtingslóg 1994	22-Des	FL	2-Jan	Fíggjarnevnd	16-Mar	18-Apr 28-0	21-Apr br. 23-0	24-0	23-Jun.	57,18-Mar.95	
65	Avtaka av kgl. fyriskipan av nr. 392 fra 3. november 1965.	2-Jan	FL	16-Jan	Menta og skúlan.	17-Mai	19-22-Mai.		Ist 23-0 nevnd24-0	26-Mai.		
66	Løgtingslóg um landskassans innlán og lán í landsbankanum.	4-Jan	FL	16-Jan	Fíggjarnevnd	27-Jan	31-Jan 29-0	14-Feb	28-0	1-Mar.	31,21-Febr.95	
67	Løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald.	4-Jan	FL	6-Jan	Skattanevnd	19-Jan.	24-Jan 20-0	27-Jan.	18-0	7-Febr.	15,1-Jan. 95	
68	Lán til Húsalánsgrunnin.	4-Jan	FL	16-Jan	Fíggjarnevnd	24-Jan.	27-Jan 25-0	31-Jan	27-0	23-Febr.	28.14-Febr. 95	
69	Broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti.	27-Jan	FL	2-Feb	Mont.og skúlan.	10-Mar.	16-Mar. 28-0	18-Apr.	30-0	8-Mai.	49,2-Mai. 95	
70	Broyting í løgtingslóg um bjálvingastuðulslán til pensjónistar.	16-Feb	FL	19-Jan	Fíggjarnevnd	24-Jan.	27-Jan. 28-0	31-Jan.	24-0	23-Febr.	29,14-Febr. 95	
71	Løgtingslóg um bygningarnar hjá Reyndarstaðini í Kollafirði	16-Jan	FL	24-Jan	Landb.nevnd	23-Febr.	8-Mar 28-0	16-Mar.	26-0	1-Mai.	46,20-Apr. 95	
72	Norðurlendskur sáttmáli um sina-millum rættarhjálp.	16-Jan	FL	27-Jan	Rættarnevnd	17-Febr.	6-Mar.		29-0	13-mar.		
73	Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnuni á landi.	16-Jan	FL	24-Jan	Fiskivinnevnd	9-Mar	16-Mar. 29-0	18-Apr	29-0	6-Mai.	48,2-Mai. 95	
74	Broyting í løgtingslóg um val til Føroya Løgting.	16-Jan	FL	19-Jan	Rættarnevnd	17-Febr	23-Febr. 28-0	9-Mar.	30-0	1-Mai.	41,14-Mar. 95	

75	Broyting í fiskivinnuloynaðarmynstrinum.		J.A.J.								
76	Skipan um loyvi at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Ruslandi/Baltisku londunum eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi.	27-Jan	FL	31-Jan.	Marknaðarnevnd	2-Febr.	14-Febr.		29-0	16-Febr.	
77	Skipan millum Føroya og Baltisku londini um sinamillum fiskirættindi í 1995.	27-Jan	FL	31-Jan	Marknaðarnevnd	13-Apr.	21-Apr. 23-0		23-0	27-Apr.	
78	Skipan millum Føroyar og Ruslan um sinamillum fiskirættindi í 1995	27-Jan	FL	31-Jan	Marknaðarnevnd	13-Apr.	21-Apr. 26-0		26-0	27-Apr.	
79	Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum	27-Jan	FL	31-Jan			31-Jan. 27-0	31-Jan.	26-0	16-Febr.	23,9-Febr. 95
80	Royndarveiða eftir stórhvali.	27-Jan	KFFF	2-Feb	Fiskivinnunevnd					Ikki avgreitt	
81	Veðurtænasta og fráboðanarskipan fyri útróðrarbátar.	27-Jan	KFFF	2-Feb	Fiskivinnunevnd	17-Mai.	19-Mai.		4-0	28-Jun.	
82	Broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya.	23-Feb	FL	16-Mar	Ment. og skólan.	22-Mai.	24-Mai. 20-0	29-Mai	23-0	23-Jun.	84,13-Jun. 95
83	Samráðingar um undirgrundarmark	27-Jan.	F.Ísaksen	31-Jan	Marknaðarnevnd	2-Febr.	2-Febr		6-0	7-Febr.	
84	Karningar í samband við skeijaveiðu.	23-Febr.	M:d'l	18-Apr	Fiskivinnunevnd	17-Mai	19-Mai		6-0	28-Jun.	
85	Ratifikation av "Montreal-protokollen om stoffer, der nedbryder ozonlaget".	14-Feb	FL	17-Feb	Umhverfisnevnd	18-Apr	21-Apr. 23-0		23-0	27-Apr.	
86	Ígildissetan fyri Føroyar av "lov om sociale ydelser på Færøerne".	14-Feb	F.	17-Feb	Alm. og heilsun. Viðg. undir einum	18-Apr	20-Apr		20-0 u.t.s.18-0	1-Mai.	
87	Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse" og "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om embedslægeinstitutioner m.v."	14-Mar	FL	17-Feb	Alm. og heilsun.	18-Apr	20-Apr		20-0 u.t.s.18-0	1-Mai.	
88	Flakavirkisskipanin aftur á privatar	17-Feb	Folkafl.	4-Mai	Iðnaðarnevnd	24/5-30/5	30-31-Mai		7-0	21-Jun.	

	hendur.					Iskoytisálit			u.t.s.28-0		
89	Framtíðarstøða Føroya.	14-Feb	FL	23-Feb	Serlig nevnd vald	23-Mai	30-Mai 19-0		19 0	21-Jun.	
90	Lýsing av sinamillum peningarenslinum millum Føroyar og Danmark.	9-Mar	Fólkafl.	21-Apr	Fíggjarnevnd	28-Mai 23-Mai	31-Mai		22 0	28-Jun.	
91	Broyting í løgtinglóg um vinnuligan Fiskiskap.	10-Mar	FL	16-Mar	Fiskivinnunevnd	1-Jun.	1-Jun. 22-0	1-Jun.	21-0	23-Jun	58,2-Jun. 95
92	Uppskot til samtyktar viðvíkjandi Føroya Fiskavirking.	16-Mar	Verkam.	Aft tikið		16-Mar.				2 Mai	
93	Lækkan av prísum, og hækkan av tænastustøðinum á strandfaraskipum.	16-Mar	Fólkafl.	21-Apr	Samferðslunevnd	23-Mai	30-Mai.		7-0	28-Jun.	
94	Broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri iðnað, handverk og tænastufyritøkur.	16-Apr	FL	20-Apr	Rættarnevnd	23-Mai	26-Mai 22-0	31-Mai	25-0	23-Jun. 95	82,13-Jun. 95
95	Broyting í løgtingslóg um Landsbank Føroya.	16-Apr	FL	20-Apr	Rættarnevnd	23-Mai	26-Mai 22-0	31-Mai	25-0	23-Jun.	81,13-Jun 95
96	Løgtingslóg um skeið til hægri fyrreikingarprøvtøku.	16-Apr	FL	24-Apr	Ment. og skúlan.	24-Mai	29-Mai		14-0	28-Jun.	
97	Løgtingslóg um studentaskúlar v.m.	18-Apr	FL	24-Apr	Ment og skúlan.	24-Mai	29-30-Mai aftur í nevnd	31-6-Jun.	28-0	1-Aug.	106,10-Jun 95
98	Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting.	18-Apr	FL	21-Apr	Rættarnevnd	23 Mai	26-Mai 22 0	31-Mai	25-0	26-Jun	95,13-Jun 95
99	Avtøka av løgtingslóg um ávísar skúlar.	18-Apr	FL	24-Apr	Ment. og skúlan.	23-Mai	29-Mai		13-0	28-Jun	
101	Avtøka av meirvirðisgjaldinum á arbeiðslønum.	18-Apr	Fólkafl.	26-Apr	Skattanevnd	23-Mai.	1-Jun.		8-0	28-Jun.	
102	Tilráðing frá Tingmannaráð Útnorðurs.	18-Apr	Tingform.	27-Apr			2-Mai		21-0	4-Mai.	
103	Broyting í løgtingslóg um útvarp.	18-Apr	FL	21-Apr	Rættarnevnd	23-Mai 31-Mai Iskoytisálit	26-Mai. 23-0	31-Mai.	26-0 u.t.s.24-0	26-Jun.	88,13-jun. 95
104	Broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd.	18-Apr	FL	21-Apr	Rættarnevnd	23-Mai.	26-Mai 22-0	31-Mai.	25-0	26-Jun.	87,13-Jun. 95

105	Broyting í løgtingslóg um sjónvarp.	18-Apr	FL	21-Apr	Rættarnevnd	23-Mai.	26-Mai. 19-0	31-Mai.	24-0	26-Jun	85,13-Jun. 95	
106	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	18-Apr	FL	20-Apr	Rættarnevnd	23-Mai.	26-Mai. 19-0	31-Mai.	20-0	26-Jun.	61,13-Jun. 95	
107	Løgtingslóg um endurstovnan av íbúðargrunninum.	18-Apr	FL	20-Apr	Alm.og heilsun.	23-Mai.	26-29-Mai. 30-0	1-Jun.	29-0	26-Jun.	65,13-Jun. 95	
108	Lækkan av søluprísinum á drekkimjólk.	18-Apr	Miðfl.	3-Mai	Alm.og heilsun.	24-Mai	31-Mai.		4-0	28-Aug.		
109	Broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakferum v.m.	18-Apr	FL	21-Apr	Skattanevnd	23-Mai	26-Mai 24-0	1-jun.	28-0	26-Jun.	63,13-Jun. 95	
110	Skattafrádráttur fyri fiskimenn.	18-Apr	KFFF	26-Apr	Skattanevnd	26-Mai	1-Jun.		12 0	28-jun.		
111	Íløgustuðul til at roykja fisk og samráðingar við ES um at hækka loftið fyri fisk úr Føroyum og kanna møguleikarnar fyri eini tollunión . Møguleikan fyri 2.250 nýggjum arbeiðsplássum í útflutningsvinnuni.	26-Apr	KFFF	4-Mai	Málið afturtikið av uppsk.stillarnum.					8-Mai.		
112	Tingsskipan Føroya Løgtings.	18-Apr	Løgtingsfr	27 Apr	Serliga nevnd	30-Mai.	31-Mai. 25-0	1-Jun.	u.t.s.23-0 I 24-0 II 4-0	21-Jun.		
113	Miðvisan landbúnaðarpolitikk í Føroyum fram til ár 2001 og ár 2006 5 og 10 ára ætlan í landbúnaðinum.	18-Apr	KFFF	3-Mai	Landb.nevnd	23 Mai.	30-Mai.		13-0 meir.,23-0	28-Jun.		
114	Krigsendurgjald fyri føroyingar mynstraðar við útlendskum fiskiskipum	20-Apr	KFFF	26-Apr	Alm. og heilsun.	23-Mai	1-Jun		32-0	21-Jun		
115	Friskúlalóg.	20-Apr	KFFF	24-Apr	Ment. og skúlan.	22-Mai.	24-Mai.		6-0	28-Jun		
116	Stovnsetan av føroyskari viðskiftastovu og setan av føroyskum umboðsmanni í Bruxell	26-Apr	KFFF	3-Mai	Marknaðarnevnd	23-Mai.	1-Jun.		7-0	28-Jun		
117	Havbit og loyvi til veiðu við garnum eftir laksi á firðum og sundum við bátum undir 20 br. reg.tons í august og september (møguleikar fyri nýggjum arbeiðsplássum.)	20-Apr	KFFF	27-Apr	Fiskivinnunevnd	17-Mai.	19-Mai.		5-0	28-Jun.		
118	Útbúgvingarverkið upp til nýggja við	18-Apr	KFFF	24-Apr	Ment. og skúlan.	19-Mai.	24-Mai		7-0	28-Jun.		

	gerð.										
119	Virðismeting av sethúsum, framd av fíggjareftirlitinum í 1993 og almenna virðisgrundartaglið á sethúsamarknaðinum í Føroyum í 1993 og í dag.	21-Apr	KFFF	4-Mai	Fíggjarnevnd	22-Mai.	24-26-Jun.		6-0	28-Jun.	
120	Samráðingar við dansku stjórnina um útbygging av flogvellinum í Vágum (Arbeiðsskapandi tiltak)	18-Apr	KFFF	3-Mai	Samferðstunevnd	23-Mai.	30-Mai.		u.t.s.26-0 8-0	28-Jun.	
121	Lækking av skattatrýstinum - lands- og kommunuskattinum.	18-Apr	KFFF	2-Mai	Skattanevnd	24-Mai.	1-Jun		8-0	28-jun	
122	Upsagn av ES-sáttmálarum, grundað á § 1, stk. a og b.	21-Apr	KFFF	27-Apr	Marknaðarnevnd	23-Mai.	1-Jun.		1-0	28-Jun	
123	Broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya.	18-Apr	FL	21-Apr	Rættarnevnd	23-Mai. 31-Mai Iskoytisál í	26-Mai. 23-0	31-Mai.	24-0 u.t.s.24-0	26-Jun.	86,13-Jun. 95
124	Broyting í løgtingslóg um náttúririðing.	20-Apr	FL	24-Apr	Rættarnevnd	23-Mai.	26-Mai. 18-0	31-Mai	20-0	27-Jun.	64,13-Jun 95
125	Broyting í løgtingslóg um fólka- og farmafluthing.	18-Apr	FL	21-Apr	Rættarnevnd	23-Mai. 31-Mai Iskoytisálit	26-Mai 24-0	31-Mai	23-0 u.t.s.24-0	26-Jun.	79,13-Jun. 95
126	Broyting í løgtingslóg um áseting av telefongjaldum.	18-Apr	FL	21-Apr	Rættarnevnd	23-Mai. 31-Mai Iskoytisálit	26 Mai. 25-0	31-Mai.	22-0 u.t.s.24-0	26-Jun.	89,13-Jun. 95
127	Fyribyrgjan av verkfals/verkbansavleiðingum	20-Apr	Miðll.	3-Mai	Arb.málanevnd	17-Mai.	22-Mai.		4-0	26-Jun.	
128	Nýggj fólkatrygging.	18-Apr	Fólkafl	3-Mai	Alm. og heilsun.	23-Mai	31-Mai.		8-0	26-Jun.	
129	Ígildissetan fyri Føroyar av lóg "om erhvervsfremme".	18-Apr	FL	27-Apr.	Ídnaðarnevnd	17-Mai	22-Mai.		25-0	21-Jun	
130	Broyting í løgtingslóg um framtaksstovn og uppskot til samþykt viðvikjandi framtaksfelag	18-Apr	Tjóðveld.	29-Apr	Fíggjarnevnd	23-Mai	31-Mai		8-0	29-Jun.	
131	Broyting í løgtingslóg um stuðul til nýggjar vinnur.	18-Apr	FL	26-Apr.	Fíggjarnevnd	22-Mai.	24-26-Mai. br.19-0	1-Jun.	22-0	26-Jun.	91,13-Jun 95
132	Setan av nevnd at gera uppskot til nýggja kommunala skipan.	20-Apr	FL	2-Mai	Rættarnevnd	24-Mai	30-Mai.		18-0		
133	Broyting í ymsum løgtings- og ríkislógum í samband við at stýrisskipan-	20-Apr	FL	24-Apr	Rættarnevnd	23- Mai.	26-Mai. 21-0	1-Jun.	30-0	1-Aug.	110,29-Jun. 95

	arlógin fær gildi (Landbúnaðarmál)										
134	Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Fiskiveiðu-og sjóvinnumál)	20-Apr	FL	24-Apr	Rættarnevnd	23- Mai. 31-Mai iskoytisálit	26-Mai. 21 0	31-Mai.	23-0 u.t.s.24-0	26-Jun.	92,13-Jun. 95
135	Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Handilsmál).	20-Apr	FL	24-Apr	Rættarnevnd	23- Mai. 31-Mai iskoytisálit	26-Mai. 25-0	31-Mai.	23-0 u.t.s.24-0	26-Jun.	78,13-Jun 95
136	Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Idnaðar-og menningarmál)	26-Apr	FL	2-Mei	Rættarnevnd	23- Mai 31-Mai iskoytisálit	26-Mai. 25-0	31-Mai.	23-0 u.t.s.24-0	26-Jun.	63,13-Jun. 95
137	Avtøka av løgtingslóg um keyp av húsagrunum.	18-Apr	FL	21-Apr	Fíggjarnevnd	2- Mai.	22-Mai 22-0	29-Mai.	24-0	26-Jun.	75,13-Jun. 95
138	Løgtingslóg um lántøku til landskassan og umfígging av landskassaskuld	18-Apr	FL	20-Apr	Fíggjarnevnd	17-Mai	19-22 Mai. 22-0	29-Mai	23-0	23-Jun.	96,13-Jun. 95
139	Broyting í løgtingslóg um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovnar.	18-Apr	FL	20-Apr	Fíggjarnevnd	22-Mai.	24-26-Mai. 24-0	1-Jun	21-0	26-Jun.	66,13-Jun. 95
140	Felagslýsingin millum landsstýrið og stjórnina.	20-Apr	FL	2-Mai	Marknaðarnevnd	23-Mai.	1-Jun		1-0 u.t.s. 18-0	29-Jun.	
141	Broytingar í tryggingarávtalulógini.	20-Apr	FL	26-Apr	Idnaðarnevnd	17-Mai.	22-Mai.		25-0	21-Jun.	
142	Tryggingarlóggávan.	20-Apr	FL	26-Apr	Idnaðarnevnd	24- Mai.	30-Mai.		25-0	21-Jun.	
143	Broytingar í tryggingarlóggávuni	20 Apr	FL	26-Apr	Rættarnevnd	23-Mai 31-Mai iskoytisálit	26-Mai 23-0	31-Mai	24-0 u.t.s.24-0	26-jun	77,13-jun. 95
144	Broyting í ávisum løgtingslógum innan kommunala økið í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi.	20-Apr	FL	24-Apr	Rættarnevnd	23-Mai 31-Mai Iskoytisálit	26-Mai 23-0	31-Mai	23-0 u.t.s 24-0	26-Jun	80,13-jun. 95
145	Broyting í lóg fyri Føroyar um stýri kirkjunnar.	20-Apr	FL	24-Apr	Rættarnevnd	23-Mai	26-Mai		24-0 24-0	21-Jun	
146	Broyting í lóg fyri Føroyar um dagpening vegna sjúku-og barnsburð.	20-Apr	FL	26-Apr	Alm.og heilsun.	17-Mai	19-Mai 28-0	22-Mai	25-0	26-Jun	94,13-jun. 95

147	Broyting í ymsum lógum innan almanna- og heilsuøkið.	20-Apr	FL	24-Apr	Rættarnevnd	23-Mai	26-Mai 20-0	31-Mai	27-0	26-Jun	93,13-jun.	95
148	Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirlon landsstýrismanna.	20-Apr	FL	24-Apr	Rættarnevnd	23-Mai 31-Mai Iskoytisálit	26-Mai 22-0	31-Mai	25-0	26-Jun	90,13-jun.	95
149	Broyting í løgtingslóg um tænastumenn landsins.	20-Apr	FL	24-Apr	Rættarnevnd	23-Mai	26-Mai 23-0	31-Mai	26-0	26-Jun	73,16-jun.	95
150	Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir.	20-Apr	FL	24-Apr.	Rættarnevnd	23-Mai 31-Mai Iskoytisáli:	26-Mai 23-0	31-Mai	26-0	27-jun	74,13-jun.	95
151	Skipan millum Føroyar og Ísland um sínamillum fiskirættindi í 1995.	20-Apr	FL	27-Apr	Marknaðarnevnd	17-Mai	19-22-Mai		28-0	21-jun		
152	Skipan millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi í 1995.	20-Apr	FL	27-Apr	Marknaðarnevnd	17-Mai	19-22-Mai		28-0	20-jun.		
153	Skipan Føroya og ES millum um sínamillum fiskirættindi í 1995.	20-Apr	FL	27-Apr	Marknaðarnevnd	17-Mai	19-22-Mai		29-0	20-jun.		
154	Øktir inntøkumøguleikar hjá setúsaeigarunum frá ferðavinnuni.	20-Apr	Fólkafl.	2-Mai	Fíggjarnevnd	23-Mai	31-Mai		8-0	29-jun		
155	Ungdómsarbeiði við fortminnum til ferðavinnuna.	20-Apr	Fólkafl.	3-Mai	Fíggjarnevnd	23-Mai	31-Mai		8-0	29-jun.		
156	Ognar og yvirvaldsrættur yvir havleiðum uttan fyri 200 fjórðinga fiski- og búskapermørk.	20-Apr	Tjóðveld.	3-Mai	Marknaðarnevnd	24-Mai	1 Jun		17-0	22-Jun		
157	Afturgjatding av setúsaskuld.	20-Apr	Tjóðveld.	4-Mai	Fíggjarnevnd	23 Mai	31-Mai		6-0	29-jun.		
158	Minstamark fyri MVG-skráseting av føroyskum framleiðsluvirkjum.	20-Apr	Tjóðveld.	28-Apr	Skattanevnd	23-Mai	1-Jun		7-0	29-jun.		
159	Broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum	20-Apr	FL	26-Apr	alm.og heilsun.	23-Mai	26-29-Mai		16-0	29 jun.		
160	Broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.	20-Apr	FL	26-Apr	Skattanevnd	23-Mai	26-Mai 22-0	1-Jun	28-0	26-Jun	72,13-jun	95
161	Avtøka av løgtingslóg um karensdag.	21-Apr	Miðfl.	2-Mai	Arb.mál.nevnd	24-Mai	29-Mai		6-0	29-jun.		
162	Avtøka av ymsum løgtingslógum (Idnaðar- og menningarmál)	26-Apr	FL	4-Mai	Idnaðarnevnd	17-Mai	22-Mai 23-0	29-Mai	32-0	26-Jun	68,13-jun.	95
163	Broyting í løgtingslóg nr. 36 frá 1/9	24-Apr	Miðfl.	27-Apr	Skattanevnd	23 Mai	1-Jun		8-0	29-jun.		

	1993 um landsskatt og kommunuskatt.											
164	Nevnalógin endurskoðast.	24-Apr	KFFF	3-Mai	Rættarnevnd	24-Mai	31-Mai		10-0	29-jun.		
165	Útsetan av Ierð Nyrups Rasmussen í Føroya vegna ósemju um dómarakanning av bankamálinum og kreppa landanna millum.	26-Apr	KFFF	4-Mai	Aftur tikið av uppskotsstillaranum					8-Mai		
166	Eitt útvarps- og sjónvarpsgjald fyri hvørt húski.	2-Mai	KFFF	4-Mai	Mentan og skúlan	26-Mai	1-Jun		4-0	29-jun.		
167	Løgtingslóg um búskaparráð.	26-Apr	FL	2 Mai	Fíggjarnevnd	23-Mai	26-29-Mai 22-0	1-Jun	23-0		120,12-jul.	95
168	Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðarettirlon.	26-Apr	FL	2-Mai	Arbeiðsmálanevnd	17-Mai	22-Mai 24-0	29-Mai	27-0	28-jun.	71 13 jun.	95
169	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	26-Apr	FL	2-Mai	Skattanevnd	23-Mai	26-Mai 21-0	1-Jun	24-0	25-jun.	62,13-jun.	95
170	Broyting í løgtingslóg um minstulon, dagsstudning og minstatervinning.											
171	Stovnsetan av einum nýggjum føroyskum banka.	26-Apr	KFFF	2-Mai	Fíggjarnevnd	17-Mai	19-Mai		3-0	29-jun.		
172	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	26-Apr	FL	2-Mai	Skattanevnd							
173	Løgtingslóg um at avmarka møguleikarnar hjá skuldarum at taka lut í almennum utbjóðingum.	27-Apr	FL	2-Mai	Rættarnevnd	24-Mai	26-29-Mai	1-Jun	29-0	23-Jun	38,20-jun	95
174	Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.	26-Apr	FL	2-Mai	Skattanevnd	24-Mai	26-Mai 19-0	1-Jun	22-0	1-aug	108, 29-jun.	95
175	Uppsøgn av avtalunum við danir og skattalætti til alt.	27-Apr	TF	2-Mai	Marknaðarnevnd	23-Mai	1-Jun		11-0	29-Jun		
176	Greyð undantikið MVG (meirvirðisgjald).	2-Mai	KFFF	4-Mai	Skattanevnd	23-Mai	29-Mai		4-0	29-Jun		
177	Avtaka av MVG á sjómanshelmum og hotellum/matstovum, sum ikki hava skeinkiloyvi.	2-Mai	KFFF	4-Mai	Skattanevnd	23-Mai	29-Mai		4-0	29-jun.		
178	Kanning av bankamálinum.	27 Apr.	FL	3-Mai	Rættarnevnd	24-Mai	30-Mai		st. minnil. 17-15	31-Mai		

179	Løgtingslóg um stuðul til flutning av fiski.	27-Apr	FL	4-Mai	Fiskivinnunevnd	26-Mai	29-Mai 24-0	1-Jun	24-0	26-jun.	67,13-jun. 95
180	Broyting í løgtingslóg um ábyrgdar-grunn.	27-Apr	FL	4-Mai	Figgjarnevnd	23-Mai	26-29-Mai	1-Jun	21-0	1-Aug. 95	109,29-jun. 95
181	Broyting í løgtingslóg um trygdar grunn fyri avreiðingar og lønir.	27-Apr	FL	4-Mai	Arb.mátanevnd	17-mai	22-Mai 23-0	29 Mai	28-0	26-jun.	70,13-jun. 95
182	Broyting í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan.	2-Mai	FL	4-Mai	Fiskivinnunevnd	17-mai	19-Mai 21-0	22-Mai	25-0	26-jun.	69,13-jun. 95
183	Løgtingslóg um ábyrgd fyri lanum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.	17 Mai	FL	19-Mai	Figgjarnevnd	22-Mai 1-Jun fsk.álit	24-26-Mai 25-0	1-Jun	28-0	26-jun	102 20-jun 95
184	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	17-Mai	FL	22-Mai	Skattanevnd	26-Mai	29-Mai 23-0	1-Jun	21-0	23-jun	101,20-jun. 95
185	Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.	17-Mai	FL	22-Mai	Skattanevnd	26-Mai	29-Mai 22-0	1-Jun	24-0	23-Jun	100,20-jun. 95
186	Broyting í løgtingslóg um rentuav-gjald og figgjarognaravgjald.	17-Mai	FL	22-Mai	Skattanevnd	26 Mai	29-Mai 23-0	1-Jun	23-0	26-Jun	103.20-jun.95
187	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.	19-Mai	FL	22-Mai	Skattanevnd	24-Mai	26-Mai 23-0	1-Jun	28-0	26-Jun	99,20-jun. 95
188	Løgtingslóg um skeið til hægri fyri-reikingarprøvtøku v.m.	30-Mai	Mentng skúlanevnd	31-Mai			1-Jun 30-0	1 Jun	30-0	1-Aug	107,29-jun 95

FYRISPURNINGUR

	til	viðvikjandi	frá	fráboðaður	atkvøðugreiðsla	atkvøður	svaraður	avgreitt
100-1	Edmund Joensen	Ætlan landsstýrisins um ES-kanningar.	T. Niclasen	19-Sept.94	21-Okt. 94	22-0	22-Des	30-Des
100-2	Andrias Petersen	Heilsuverk Føroya.	J. av Rana	18-Okt. 94	21-Okt. 94	25-0	21-Des	30-Des
100-3	Ivan Johannesen	Hákavinnan í Vági.	J. Olsen	18-Okt. 94	21-Okt. 94	25-0	5-Des.	7-Des
100-4	Edmund Joensen	Umsitingin í almannamálum.	L. Klein					
100-5	Andrias Petersen	Viðgerðartíðin av kærum í almannamálum.	K. Magnussen	21-Okt. 94	27-Okt. 94	21-0	21-Des	30-Des
100-6	Edmund Joensen	Sparingar og bygnaðarbroytingar í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu, skúla og almanna- og samskiftsøkinum.	J. Olsen		8-Nov. 94	15-0		29-Jun
100-7	Ivan Johannesen	Avmontering-n av Føroysku høvuðsvinnuni.	B.Djurholm	8-Nov. 94	10-Nov. 94	20-0	5 Des	7-Des.
100-8	Eilif Samulesen	Analfabetismu í Føroyum.	Ó.Brockmann		19-Des 94	11-0		29Jun.
100-9	Ivan Johannesen	Felagskvoturi hjá útróðrarbátum yvir 20 brt.	J.Olsen	16-Jan. 95	19-Jan. 95	26-0	10-Mar.	13-Mar.
100-10	Sámal Petur í Grund	Uppsagnin av fólki í Akrabergi	J. Olsen	16-Jan. 95	19-Jan. 95	15-0		29-Jun.
100-11	Sámal Petur í Grund	Ras Tórshavn.	F.Ísakson	27-Jan. 95	31-Jan. 95	23-0	10-Mar.	13-Jun.
100-12	Andrias Petersen	Kommunulæknaskipanin í Føroyum.	E. Høj	31-Jan. 95	2-Febr. 95	17-0	1-Jun.	22-Jun
100-13	Edmund Joensen	Viðv. seismisku kanningunum, sum verða gjørdar við Føroyar.	J.Petersen	14-Febr 95	17-Febr 95	28-0	27-Apr	2 Mai
100-14	Eilif Samulesen	Viðv. teknisku skúlunum	Á.Zachariasen	14-Febr 95	17-Febr. 95	28-0	27-Apr.	2-Mai
100-15	Edmund Joensen	Viðv. fundinum 23 jan 1995 við umboð fyri A.P.Møller o. o.	V.Johannesen	14-Febr 95	17-Febr. 95	18-0	27-Apr.	2-Mai
100-16	Andrias Petersen	Viðv. farloyvisgrunni.	T. Niclasen		23-Febr. 95	27-0	1-Jun.	22-Jun.
100-17	Jóannes Eidesgaard	Tollettirlitinum á flogvøllinum.	T. Niclasen	23-Febr. 95	9-Mar. 95	26-0	20-Apr.	1-Mai
100-18	Ivan Johannesen	Skeljaveiðu, havbotninum og øðrum veiðuhættum.	J. Olsen	23-Febr. 95	9-Mar. 95	24-0	20-Apr.	1-Mai
100-19	Andrias Petersen	Kanningin av maguleikunum fyri aktivering av avsettum peningi at lætta um liggjarstaðuna hjá sethúsaeigarum.	B.Djurholm	18 Apr. 95	20-Apr. 95	20-0		
100-20	Bent Klinte, ríkisumboðsmann.	Viðv. Føroyabólkinum (Færogruppen)	F.Isakson	18-Apr. 95	20-Apr. 95	20-0	4-Mai.	8-Mai

100-21	Óli Jacobsen	Lógin um etiskt ráð og regulgering av biomedicinskari gransking.	L. Klein	24-Apr. 95	27-Apr. 95	23-0	1-Jun	22-Jun.	
100-22	Sámal Petur í Grund	Um møguleikarnar hjá Føroyum, at fáa part av tí gjaldi, ið flogfør rinda, sum flúgva í føroyskum loftrúm og um møguleikarnar hjá føroyingum at átaka sær eftirlit við flogferðsluni í føroyskum loftrúmi.	S. á Brúnni	24-Apr. 95	27-Apr. 95	22-0	1-Jun.	22-Jun	

Ólavsøkutingsetan 1994

Ár 1994, fríggjadagin 29. juli kl. 13.00 varð løgtingið sett. Tingformaðurin frá seinastu tingsetu, Jógvan I. Olsen, las upp skriv dagfest 25. juli 1994, har løgmaður stevnir løgtingsmonnum til tings ólavsøkudag og lýsti ólavsøkutingið 1994 at vera sett.

Tingmenninir eru:

Norðoya valdømi:

Anfinn Kallsberg, Viðareiði, ff.,
Vilhelm Johannesen, Klaksvík, jv.,
Álvur Zachariassen, Klaksvík, sj.,
Heini O. Heinesen, Kunoy, tj.

Eysturoyar valdømi:

Kjartan I. Joensen, Leirvík, ff.,
Edmund Joensen, Oyri, sb.,
Jógvan I. Olsen, Toftir, sb.,
Signar á Brúnni, Fuglafjørður, tj.,
Lasse Klein, Saltangará, krf.,
Tordur J. Niclasen, mf.,
Óli Jacobsen, Tórshavn, vmf.

Norðstreymoyar valdømi:

Maria Hansen, Vestmanna, sb.,
Jógvan Durhuus, Vestmanna, tj.

Suðurstreymoyar valdømi:

Óli Breckmann, Tórshavn, ff.,
Bjarni Djurholm, Tórshavn, ff.,
Bjørn á Heygum, Tórshavn, sb.,
Lisbeth L. Petersen, Tórshavn, sb.,
Finnbogi Arge, Tórshavn, sb.,
Helena Dam á Neystabø, Tórshavn, sj.,
Finnbogi Ísakson, Tórshavn, tj.,
Kristian Magnussen, Tórshavn, vmf.,
Marita Petersen, Tórshavn, jv.,
Jenis av Rana, Tórshavn, mf.

Vága valdømi:

Ivan Johannessen, Miðvágur, sb.,
Jørgen Niclasen, Sørvágur, ff.

Sandoyar valdømi:

Jógvan Adolf Johannessen, Skopun, jv.,
John Petersen, Skopun, ff.

Suðuroyar valdømi:

Jákup Joensen, Lopra, sb.,
Jóannes Eidesgaard, Tvøroyri, jv.,
Henrik Old, Vágur, jv.,
Jákup Olsen, Vágur, krf.,
Ingeborg Vinther, Vágur, vmf.

Formaðurin bað tingmenninar Ivan Johannesen og Henrik Old vera fyribils tingskrivarar.

Síðani fór fram val av formansskapi.

Til formann varð Jógvan I. Olsen valdur. Til 1. næstformann varð Jógvan Durhuus valdur, til 2. næstformann varð Anfinn Kallsberg valdur og til 3. næstformann varð Ingeborg Vinther vald.

Til 1. og 2. skrivara vórðu valdir ávikavist Ivan Johannesen og Henrik Old.

- - -

15. september 1994 fór samb. § 4 í løgtingslóg nr. 2 frá 13. mai 1948 um umboðsvald Føroya fram val av løgmanni.

Lisbeth L. Petersen skeyt vegna samgonguna upp at velja Edmund Joensen. Atkvøtt varð við seðlum og við 18-0 atkvøðum varð Edmund Joensen valdur til løgmann.

15. september 1994 skeyt løgmaður samb. § 5 í løgtingslóg nr. 2 frá 13. mai 1948 um umboðsvald Føroya hesar upp til landsstýrismenn:

1. Ivan Johannesen,
2. Eilif Samuelsen,
3. Jóannes Eidesgaard,
4. Andrias Petersen,
5. Sámal Petur í Grund,
6. Óli Jacobsen.

Við 18-0 atkvøðum vórðu heslir valdir.

19. september 1994 fór fram nýtt val av formansskapi.

Til løgtingsformann varð vald Marita Petersen. Til 1. næstformann varð Anfinn Kallsberg valdur, til 2. næstformann varð Ingeborg Vinther vald og til 3. næstformann varð Signar á Brúnni valdur.

Til 1. og 2 skrivara vórðu valdir ávikavist Jógvan I. Olsen og Jørgen Niclasen.

- - -

17. februar 1995 boðaði formaðurin frá, at seinasti framløgudagur í hesi tingsetu varð ásettur til hósdagin 23. mars 1995. Álit í tingmálum skuldu leggjast fyri tingið í seinasta lagi tann 27. apríl 1995.

10. mars 1995 fór fram val av nevnd við umboðum úr øllum flokkum at viðgera løgtingsmál nr. 89/1994: Framtíðarstøða Føroya.

Vald vórðu:

Jógvan I. Olsen, Anfinn Kallsberg, Marita Petersen, Finnbogi Ísakson, Ingeborg Vinther, Helena Dam á Neystabø, Jákup Olsen og Tordur J. Niclasen.

26. apríl fór fram val av løgtingsgrannskoðarum. Valdir vórðu:

Fastir limir:

Karl Robert Johansen, Atli Hansen, Finnbogi Ísakson og Óli Breckmann.

Tiltakslimir:

Ingeborg Vinther, Lisbeth L. Petersen, Heini O. Heinesen og Anfinn Kallsberg.

2. mai 1995 samtyktu løgtingsmenn at velja hesar limir í serliga nevnd at viðgera løgtingsmál nr. 112/1994: Tingskipan Føroya Løgtings:

Bjørn á Heygum, Anfinn Kallsberg, Finnbogi Ísakson, Ingeborg Vinther, Tordur J. Niclasen, Helena Dam á Neystabø, Lasse Klein og Vilhelm Johannesen.

17. mai 1995 bar løgtingsformaðurin fram minningarorð um Jørgen Thomsen, fyrrverandi løgtingsmann, sum andaðist mánadagin 15. mai 1995. Aftaná reistust tingmenn og mintust Jørgen Thomsen í tøgn eina løtu.

Hóskvøldið 1. juni 1995 kl. 23.50 varð síðsti tingfundur settur.

Løgmaður endaði tingsetuna.

Tingnevndir

1. august 1994 fór fram val av tingnevndum samb. § 7 í tingskipanini:

Fíggjarnevndin:
Fastir limir:

Finnbogi Arge, Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Lasse Klein, Tórður J. Niclasen, Vilhelm Johannesen og Heini O. Heinesen.

Tiltakslimir:

Lisbeth L. Petersen, Jákup Olsen, Bjarni Djurholm, Kristian Magnussen, Jenis av Rana, Jóannes Eidesgaard og Álvur Zachariassen.

Fiskivinnunevndin:
Fastir limir:

Jógvan I. Olsen, Jákup Joensen, John Petersen, Kjartan I. Joensen, Óli Jacobsen, Henrik Old og Heini O. Heinesen.

Tiltakslimir:

Maria Hansen, Lisbeth L. Petersen, Jákup Olsen, Jørgen Niclasen, Ingeborg Vinther, Álvur Zachariassen og Jógvan Durhuus.

Marknaðarnevndin:
Fastir limir:

Edmund Joensen, Bjørn á Heygum, Bjarni Djurholm, Jørgen Niclasen, Kristian Magnussen, Helena Dam á Neystabø og Jógvan A. Johannessen.

Tiltakslimir:

Maria Hansen, Jákup Joensen, Jenis av Rana, Kjartan I. Joensen, Ingeborg Vinther, Finnbogi Ísakson og Marita Petersen.

Samferðslunevndin:

Maria Hansen, Óli Breckmann, Jákup Olsen, Jenis av Rana, Kristian Magnussen, Jógvan A. Johannessen og Jógvan Durhuus.

Rættarnevndin:

Bjørn á Heygum, Bjarni Djurholm, Jenis av Rana, Helena Dam á Neystabø og Jógvan Durhuus.

Skattanevndin:

Finnbogi Arge, Óli Breckmann, Lasse Klein, Vilhelm Johannesen og Heini O. Heinesen.

Almanna- og heilsunevndin:

Maria Hansen, Jørgen Niclasen, Kristian Magnussen, Heini O. Heinesen og Henrik Old.

Mentannar- og skúlanevndin:

Finnbogi Arge, Bjarni Djurholm, Jenis av Rana, Jógvan A. Johannessen og Heini O. Heinesen.

Landbúnaðarnevndin:

Jákup Joensen, Anfinn Kallsberg, Ingeborg Vinther, Jógvan Durhuus og Henrik Old.

Ídnaðarnevndin:

Edmund Joensen, Kjartan I. Joensen, Jákup Olsen, Jógvan A. Johannessen og Heini O. Heinesen.

Umhvørvisnevndin:

Ivan Johannesen, Óli Breckmann, Óli Jacobsen, Vilhelm Johannesen og Jógvan Durhuus.

Arbeiðaramálanevndin:

Maria Hansen, John Petersen, Ingeborg Vinther, Álvur Zachariassen og Jógvn A. Johannessen.

Landsstýrismálanevndin:

Lisbeth L. Petersen, Óli Breckmann og Vilhelm Johannesen.

Norðurlandaráðið:

Fastir limir:

Anfinn Kallsberg og Marita Petersen.

Varalimir:

Bjørn á Heygum og Signar á Brúnni.

- - -

19. september 1994 fór fram nýtt val av tingnevndum:

Fíggjarnevndin:

Fastir limir:

Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariassen, Kristian Magnussen, Anfinn Kallsberg, Finnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen.

Tiltakslimir:

Lisbeth L. Petersen, Henrik Old, Helena Dam á Neystabø, Ingeborg Vinther, Bjarni Djurholm, Signar á Brúnni og Jenis av Rana.

Fiskivinnunevndin:

Fastir limir:

Henrik Old, Jákup Joensen, Álvur Zachariassen, Karl Robert Johansen, John Petersen, Heini O. Heinesen og Jákup Olsen.

Tiltakslimir:

Jógvan A. Johannessen, Maria Hansen, Helena Dam á Neystabø, Kristian Magnussen, Kjartan I. Joensen, Jógvan Durhuus og Lasse Klein.

Marknaðarnevndin:

Fastir limir:

Helena Dam á Neystabø, Jógvan I. Olsen, Jógvan I. Johannessen, Ingeborg

Vinther, Bjarni Djurholm, Jógvan Durhuus og Jenis av Rana.

Tiltakslimir:

Álvur Zachariassen, Lisbeth L. Petersen, Marita Petersen, Kristian Magnussen, Jørgen Niclasen, Finnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen.

Samferðslunevndin:

Jákup Joensen, Henrik Old, Helena Dam á Neystabø, Kristian Magnussen, Kjartan I. Joensen, Signar á Brúnni og Lasse Klein.

Rættarnevndin:

Bjørn á Heygum, Jóannes Eidesgaard, Helena Dam á Neystabø John Petersen og Signar á Brúnni.

Skattanevndin:

Ivan Johannsen, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen, Jørgen Niclasen og Finnbogi Ísakson.

Almanna- og heilsunevndin:

Kristian Magnussen, Maria Hansen, Jóannes Eidesgaard, Jørgen Niclasen og Lasse Klein.

Mentannar- og skúlanevndin:

Jógvan A. Johannessen, Finnbogi Arge, Ingeborg Vinther, Bjarni Djurholm og Signar á Brúnni.

Landbúnaðarnevndin:

Álvur Zachariassen, Jógvan I. Olsen, Henrik Old, Óli breckmann og Jákup Olsen.

Ídnaðarnevndin:

Jógvan A. Johannessen, Jákup Joensen, Álvur Zachariassen, Kjartan I. Joensen og Heini O. Heinesen.

Umhvørvisnevndin:

Vilhelm Johannesen, Bjørn á Heygum, Karl Robert Johansen, Óli Breckmann og Jógvan Durhuus.

Arbeiðaramálanevndin:

Edmund Joensen, Jóannes Eidesgaard, Ingeborg Vinther, Heini O. Heinesen og Jenis av Rana.

Landsstýrismálanevndin:

Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen og Kjartan I. Joensen.

Norðurlandaráðið:

Fastir limir:

Maria Hansen og Anfinn Kallsberg.

Varalimir:

Jógvan I. Olsen og Bjarni Djurholm.

- - -

10. august fór fram val av limum og eykalimum í Tingmannaráð Útnorðurs.

Vald vórðu:
Fastir limir:

Lisbeth L. Petersen, John Petersen, Ingeborg Vinther, Henrik Old, Signar á Brúnni og Jákup Olsen.

Tiltakslimir:

Maria Hansen, Jørgen Niclasen, Kristian Magnussen, Vilhelm Johannesen, Heini O. Heinesen og Lasse Klein.

FRÁGREIÐING FRÁ LØGMANNI 1994

Nú tingið verður sett ólavsøkudag 1994 verður hetta gjørt undir óvanligum politiskum umstøðum, tí hetta er fyrsta ólavsøkan, at landsstýrið, sum situr, er starvsstjórn.

Tann 19. mai 1994 samtykti tingið at skriva út nýval, av tí at samgongan millum javnaðarflokkin, tjóðveldisflokkin og sjálvstýrisflokkin hevði mist meirilutan í tinginum. Valdagurin varð ásettur til 7. juli 1994.

Hetta er fyrstu ferð, at val til løgtingið hevur verið á hásumri, í juli mánaði, síðani 1906, tá klovningur kom í millum samband og sjálvstýri. Tað árið varð val hildið 18. juli.

Ongantíð fyrr hava so nógvir flokkar stillað upp til løgtingsval sum hesa ferð, heilir 10. Úrslitið av valinum er, at átta flokkar komu inn á ting, og nærum helmingurin av tingmanningini er nýggj.

Síðani valið hevur verið samráðst um samgongu, men ikki eydnaðist at skipa nýggja áðrenn ólavsøkudag. Hetta er tí tað sama landsstýrið, ið misti meirilutan í mai, sum enn situr í Tinganesi.

Skipanin, at løgmaður heldur røðu á ólavsøku, er ikki ásett í galdandi stýrisskipan, men hevur í verki verið fylgd í nógv ár. Í nýggju stýrisskipanini er hesin siður lógarfestur.

Í røðu síni greiðir løgmaður frá støðu landsins, umrøður tað, sum er farið fram undanfarna árið og sigur frá teimum ætlanum, landsstýrið vil fremja í nýggju tingsetuni.

Løgmansrøðan í ár verður nakað øðrvísi við tað, at ikki ber til hjá sitandi landsstýri at siga frá framtíðararbeiðinum. Hetta má bíða til nýggj samgonga er skipað, og tann tá valdi løgmaðurin leggur fram politikkin, ætlanin er at reka.

<u>Føroyski búskapurin</u> hevur seinastu árini verið fyri stórari afturgongd, eini afturgongd, sum eftir ymiskum viðurskiftum at døma væntandi er um at steðga.

Seinna hálvár í 1993 helt niðurgongdin í samfelagnum fram, og hetta sást aftur í úrslitinum hjá landskassanum, tá árið var runnið.

Inntøkur landskassans í 1993 vóru 185 mió. kr. minni, enn mett varð á fíggjarlógini og vanligu rakstrarútreiðslurnar íroknað fløgur vóru 96 mió. kr. størri enn mett. Ein fyribils uppgerð av landsins roknskapi fyri 1993 vísir eitt "vantigt" hall hjá landskassanum uppá 251 mió. kr. eftir fløguútreiðslur, meðan mett varð eitt avlop á fíggjarlógini uppá 29 mió. kr. eftir fløguútreiðslur.

Haraftrat komu lántøkur til gjaldføri landskassans og -serliga - til bankarnar. Íroknað eginpeningsveitingarnar til bankar og almennar grunnar gjørdist hall landskassans methøgt í 1993: 2,65 mia. kr.

Landsstýrið legði 31. august 1993 uppskot fyri tingið um fíggjarlóg fyri 1994. Roknað varð

við einum halli eftir fløguútreiðslur uppá 248 mió. kr.

Tá samráðingar vóru við stjórnina 12. oktober, vóru viðurskiftini longu broytt so nógv, at hallið varð mett til 540 mió.kr. Orsøkirnar vóru fleiri: skattainntøkurnar vórðu nú mettar 100 mió. kr. lægri, kurstap uppá 60 mió. kr. kom aftrat á útreiðslusíðuni, almennir grunnar kravdu størri stuðul enn mett, og nýggj lántøka hevði við sær, at rentuútreiðstur landskassans hækkaðu 90-100 mió. kr.

Semja var millum landsstýrið og stjórnina um, at fíggjarlógin skuldi bøtast við 250 mió.kr. Landsstýrið sendi fíggjarnevndini tilmæli um at lækka rakstrar- og fløguútreiðslurnar uml. 100 mió. kr.

Haraftrat vórðu fleiri inntøkulógir samtyktar. Skattastigin varð broyttur nakað, so at serliga tær hægstu inntøkurnar komu at gjalda hægri skatt. Høvuðsinntøkubroytingin stavaði tó frá tí nýggja fíggjarognaravgjaldinum uppá 1,9% p.a, sum skuldi falla til gjaldingar tríggjar ferðir: í desember 1993 og juli og desember 1994. Tað varð mett at geva landskassanum 200 mió.kr.

Tá fíggjarlógin endaliga var samtykt, varð roknað við einum halli uppá 262 mió. kr. í 1994. Verður gongdin í samfelagnum tann sama seinna hálvár sum fyrra hálvár, eru útlit til, at fíggjarlógin fer at halda.

Skattainntøkur landskassans fyrra hálvár 1994 vóru 355 mió.kr, eitt sindur meira enn mett varð. Inntøkurnar av meirvirðisgjaldi vóru fyrra hálvár 186 mió.kr. Roknast kann við, at inntøkur landskassans tilsamans í 1994 verða heldur hægri enn í 1993.

Gjaldføri landskassans hevur verið væl betri higartil í ár, enn roknað varð við fyrst á árinum.

Í 1993 var avlopið á gjaldsjavnanum 719 mió.kr. Gongdin fyrra hálvár 1994 bendir á, at avlopið fyri alt árið 1994 verður heldur minni enn í 1993.

Avlopið á handilsjavnanum minkaði 150 mió.kr., t.v.s. úr 400 mió.kr. fyrra hálvár 1993 niður í 250 mió.kr. fyrra hálvár 1994. Høvuðsorsøkin er, at útflutningurin er fallin 177 mió.kr., meðan innflutningurin bert er fallir 18 mió.kr.

Samanumtikið kann sigast, at heldur gongdin seinna hálvár 1994 fram restina av árinum, so verður gjaldsjavnaavlopið omanfyri 300 mió.kr. í mun til eitt avlop uppá 719 mió.kr. í 1993. Tá er m.a. lagt upp fyri øktum rentuútreiðslum í 1994 orsakað av rentuhækkingum í árinum.

Nettoskuldin uttanlands minkaði úr 7,8 mia.kr. í 1992 niður í 6,6 mia.kr. við árslok 1993 - ein minking uppá 1,2 mia.kr. Hyggja vit harafturímóti nærri at býtinum millum almennu og privatu nettoskuldina, er nettoskuldin hjá tí almenna vaksin við 2,2 mia.kr. úr 5,3 mia.kr. í 1992 upp í 7,5 mia.kr. við árslok 1993, meðan tað privata átti netto 924 mió.kr. til góðar uttanlands.

Henda gongd hongur saman við kreppuni í samfelagnum sum heild, har útlendskir lánveitarar hava mist í sambandi við tey mongu trotabúgvini, landskassin hevur havt stór veðhaldsútlegg, og neyðugt hevur verið at tikið miljardalán til bankarnar og landskassan.

Búskaparliga sær heldur bjartari út nú enn undanfarin ár. Lønarútgjaldingarnar, sum siga nakað um vinnuliga virksemið í landinum, minka ikki so nógv sum mett, og eru summar mánaðir hægri enn somu mánaðir í fjør. Arbeiðsloysið minkaði úr 23% í januar í ár niður í 16% í juni, og avreiðingarnar til flakavirkini eru øktar 20%. Men útflutningsvirðið er fallið 15% fyrst og fremst av tí, at útflutningurin av ísaðum fiski og laksi er minkaður, men eisini tí at prísirnir eru heldur lægri enn í 1993.

Almenna fløguvirksemið er minkað mógv, men landsstýrið helt tað kortini verða neyðugt at ávísari upphædd á fíggjarlógini til fløgur og viðlíkahald fyri at bøta um m.a. arbeiðsloysið. Privatu fløgurnar eru sera avmarkaðar, men vónandi fer kortini at bera til við teimum fortreytum, sum skaptar eru seinastu tíðina, at fáa gongd aftur á privata fløguvirksemið soleiðis, at alt fleiri fólk kunna koma í arbeiði.

Ótryggleikin í bankavinnuni helt fram seinna hálvár 1993. Bæði Sjóvinnubankin og Føroya Banki komu aftur í trupulleikar, og landskassin noyddist í september 1993 at flyta tilsamans 1,86 mia. kr. í kapitali aftrat í báðar bankarnar fyri at tryggja framhaldandi rakstri. Fossbankin fór í gjaldsteðg 11. oktober og seinni í likvidatión.

Danska fíggjareftirlitið hevði frammanundan gjørt nýggjar metingar av virðunum á útlánunum hjá peningastovnunum, og tað vóru serliga lægri metingar av sethúsavirðunum, sum raktu meint.

Í august 1993 mælti fíggingargrunnurin stjórnini og landsstýrinum til at góðkenna, at Føroya Banki og Sjóvinnubankin vórðu samanlagdir. Hetta varð góðkent, men teir trupulleikar, sum síðani stungu upp, høvdu við sær, at samanleggingin varð útsett. Á aðalfundi í háðum bankunum í vár varð samtykt at leggja saman 1. januar í ár.

Landskassin hevur tilsamans sett 2,7 mia. kr. í báðar bankarnar og eigur gjøgnum fíggingargrunnin mestsum allan partapeningin, sum er 250 mió.kr.

Gjaldførið hjá bankanum er gott, og sambært upplýsingum frá bankanum er soliditeturin eisini góður.

Samanumtikið er líkt til, at fíggjarkervið í Føroyum er væl tryggari nú enn undanfarin ár.

Í sambandi við avtaluna í oktober 1993 millum donsku stjórnina og landsstýrið varð avtalað at seta eina føroysk-danska nevnd við umboðum fyri landsstýrið, landsbankan, føroyskar peningastovnar, forsætis-, búskapar,- fíggjar- og ídnaðarmálaráðið og danska tjóðbankan at lýsa kapital- og gjaldførisviðurskiftini í Føroyum. Nevndin hevur nú latið landsstýrinum frágreiðingina, og landsstýrið heldur hesa frágreiðing saman við øðrum frágreiðingum um føroyska búskapin verða við til at skapa eitt betri yvirlit yvir teir trupulleikar, sum eru, og hvussu vit møguliga eiga at loysa teir.

Fiskiskapur á føroyska landgrunninum er høvuðsgrundarlagið fyri fiskiídnaðin og fyri stóran part av fiskiflotanum. Landsstýrið hevur tí lagt stóran dent á at fáa bygt høvuðsfiskastovnarnar uppaftur.

Í hesum ári eru rættiliga harðar avmarkingar settar fyri fiskiveiðuna um Føroyar. Stór øki

vóru friðað fyri troling, og kvotur vórðu ásettar.

Stovnsrøktarnevnd við umboðum frá vinnulívinum er sett. Nevndin hevur nú latið álit, og er nevndin samd við landsstýrið um, at toska- og hýsustovnurin er á eitum alt ov lágum støði, og mælir nevndin í sínum áliti til, at avmarkingin av fiskiskapinum á landgrunninum við Føroyar av toski eigur at setast til 9.800 tons og av hýsu til 8.500 tons. Bygnaðarnevndin hevur sett hesi tøl til 6.800 og 6.200 tons. Sostatt er bæði vinnan og vísindafólk samd við landsstýrið um at halda roynditnar eftir hesum høvuðsfiskasløgum á einum lágum støði.

Fiskiveiðulógin hevur roynst hampuliga. Nakað av trupulleikum vóru væntandi, tí hetta var ein kollvelting - ein neyðug kollvelting - fyri at byggja upp og tryggja høvuðslívsgrundarlagið fyri framtíðina.

Ráðgevandi nevndin viðvíkjandi fiskiveiðu - § 2 nevndin - hevur eisini latið Føroya landsstýri álit, har hon metir um lógina.

Nevndin mælir m.a. til, at øll før yvir 20 tons fáa egnkvotur. Eisini mælir nevndin til størri umsetiligheit, so flotin kann laga seg til teir tøku møguleikarnar. Mælt verður eisini til aðrar tekniskar broytingar.

Samanumtikið er landsstýrið nøgt við, at hesar nevndir, ið hava stóra umboðan frá vinnulívinum í høvuðsheitinum taka undir við tí førda fiskivinnupolitikkinum.

Lívsgrundarlagið hjá fjarfiskiflotanum hevur seinasta árið verið betri enn árini frammanundan, m.a. er kvotan í Barentshavinum munandi størri, enn hon var. Landsstýrið hevur í hesum sambandi latið nakað av heimaflotanum fáa loyvi at fiska av hesi kvotu, og er hetta komið serliga væl við hjá línuflotanum. Sambært nýggju fiskiveiðulógini hevur landsstýrið eisini givið loyvi til eina umsetiligheit á fjarleiðunum, sum hevur ført við sær, at størri virði fáast burturúr.

Alternativur fiskiskapur undir Føroyum og í altjóða sjógvi hevur verið troyttur, og landsstýrið hevur givið nógv royndarloyvi. Landsstýrið hevur eisini játtað innflutningsloyvi til fiskiskip at fiska á Hatton Bank, í Irmingerhavinum, umframt at tvey rækjuskip eru komin afturat.

Royndir verða stuðlaðar fyri at fáa meira burturúr kongafiskinum í Irmingerhavinum og fáa hann til lands til virkingar í Føroyum.

Viðvíkjandi nýggjum arbeiðsplássum innan fiskiídnaðin hevur landsstýrið havt ta grundfatan, at fyri at slík arbeiðspláss kunnu verða lønandi og harvið varandi, er neyðugt, at tey, ið fara í holt við hetta, hava greiðar ætlanir, bæði fyri marknaði, virking og veiðu.

Alt ov nógvir møguleikar eru seinastu 10-15 árini farnir fyri skeyti, tí ætlanirnar ikki høvdu hesi trý høvuðslið.

Slíkur arbeiðsháttur tekur tíð, men er neyðugur, um vit skulu røkka málinum at fáa fleiri arbeiðspláss innan fiskiídnaðin. Hetta er grundhugsanin undir samtyktu løgtingslóg um stuðul og menning av fiskivinnuni á landi.

Aftaná stórar trupulleikar í alivinnuni orsakað av ymiskum umstøðum bæði fíggjarligum og umhvørvisligum hevur verið arbeitt við at endurskipa alivinnuna.

Arbeiðið hevur verið gjørt í neyvum samstarvi við teir, sum reka hesa vinnu.

Ein skiftisøkisskipan er gjørd, sum ber í sær, at alisloyvistalið er komið niður á umleið 20. Hetta verður av serkunnleikanum metti sum eitt tal í hægra lagi. Samumtikið má tó sigast, at endurskipanin er komin so nógv áleiðis, at útlitini fyri vinnuna bæði so og so eru av teimum frægastu, tey hava verið í nógv ár.

Smáídnaðurin á landi er merktur av, at næstan øll framleiðslan er ætlað heimamarknaðinum. Vánaliga keypiorkan er tí orsøkin til støðuna hjá hesum partinum av ídnaðinum.

Hóast døpru útlitini, eru vinnulívsfólk ikki fallin í fátt og arbeiða nú við nýggjum skilagóðum verkætlanum, sum eru munandi betur lagaðar til føroysk viðurskifti enn áður.

Fyri at stuðla hesum partinum av ídnaðinum legði landsstýrið fram tvey lógaruppskot, sum bæði vórðu samtykt - tað eru lógirnar um ábyrgdargrunn og lógin um framtaksfelag umfram kunngerðin um Tax Free Shopping.

Royndarstøðin í Kollafjarðardali er vorðin ein búnaðardepil, og tað er nú landbúnaðarvinnan, sum avger, hvat tey sjálvi fáa burturúr deplinum. Royndar- og ráðgevingarvirksemið beldur fram sum áður, og støðin hevur framvegis lærlingar.

Landsstýrið setti í fjør heyst nevnd at kanna framtíðina hjá føroyska landbúnaðinum, m.a. við tí í hyggju at broyta alla landbúnaðarlóggávuna.

Tað eydnaðist ikki at fáa samtykt lógarbroytingar, so at jarðargrunnurin kundi fáa loyvi at niðurskriva ella umleggja lán, so vinnan kann koma niður á eitt kostnaðarstøði, sum er hóskandi fyri fíggjarligu umstøðurnar í dag.

Ferðavinnan gevur sum íkast til búskapin umleið 150 mió. kr. Bera vit okkum rætt at, so kann hetta virðið økjast til umleið 300 mió. kr. um eini 6-7 ár.

Nógv stig eru tikin til tess at veita ferðavinnuni betri umstøður og soleiðis at fyriskipa ein miðvísan politikk á hesum økinum. Ferðaavgjaldið varð í apríl minkað úr 300 kr. niður í 120 kr. Gjørd er eisini ein heildarætlan fyri ferðavinnuna, sum í høvuðsheitinum byggir á trí ggjar tættir: menning av verandi ferðavinnu, marknaðarføring í umheiminum og menning av ferða-tilboðum. Heildarætlanin verður løgd fram í august.

Landsstýrið hevur saman við Ferðaráðnum tikið stig til at víðka samstarvið við hini londini í útnorði, Ísland og Grønland.

Hóast arbeiðsloysið er minkandi, so er hetta og fráflytingin størsta hóttanin í samfelagnum. Arbeiðsloysið er minkað síðan miðjan januar 1994, tá tað var skrásett til 23%. 1. juli í ár var tað sett til 16%, ið er 2% lægri enn í juli í fjør. Viðmerkjast skal, at arbeiðsstyrkin fyrra hálvár í 1993 var 22.400, meðan hon í dag er 21.100.

Arbeiðsloysisskipanin hevur hórað ígjøgnum fíggjarliga, hóast kassin fleiri ferðir hevur verið um at vera tómur.

Landsstýrið útvegaði í vár skipanini møguleika at trekkja upp á eitt lán úr føroysku peningastovnunum upp til 45 mió.kr., men enn hevur stýrið ikki gjørt nýtslu av hesum. Hetta lán er við landskassaveðhaldi.

Avtalan millum Føroyar og Danmark um samskipan av skipanunum fyri tey arbeiðsleysu kom í gildi 1. nov. í fjør.

Gjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin verður nú ikki longur lænt til AL.S, men fer til grunnin, sum eftir ætlan skal gjalda út ískoyti til pensjónirnar í 1997.

Nettofráflytingin úr Føroyum frá januar til juni var 750 fólk, og tað er knappliga 300 fleiri enn sama tíðarskeið í fjør. Hinvegin vísir tað seg, at størri parturin av teimum, sum flyta til Føroya, hava verið burturi í styttri enn eitt ár, og kann hetta týða at nøkur flyta skjótt heimaftur.

Framvegis fer stórur partur av teimum, sum flyta niður, í útbúgvingar- og lestrarørindum, og er hetta skilagóð fløga júst í hesum kreppudøgum.

Til arbeiðsskapandi tiltøk fyri ung, sum kommunurnar hava umsitið á verandi fíggjarlóg eru brúktar 10 mió.kr.
Í farna valskeiði eydnaðist at fáa samtykt javnstøðulógina. Føroyar eru seinasta Norðurlandi, ið hevur fingið slíka lóggávu.

Hóast almannamál og heilsumál eru tey mest kostnaðarkrevjandi málsøkini (45% av rakstrarútreiðslunum á fíggjarlógini), so hava svára kreppan og tær nógvu sparingarnar tó ikki gjørt, at støðið er munandi versnað. Tað ber enntá til at siga, at ávís stig eru tikin til tess at betra og útbyggja innan hesi málsøki, sum saman við útbúgvingarøkinum eru eyðkennini fyri eitt nýmótans samfelag, og sum eru grundarsteinurin undir vælferðini.

Samanleggingar, rationaliseringar og effektiviseringar eru framdar, til tess at gera tænasturnar betri.

Almannastovan hevur meira enn nakar annar almennur stovnur verið frammi í fjølmiðlunum í hesum valskeiðinum, og stór framstig og ábøtur eru framdar í umsitingini.

Miðfyrringin av almannaumsitingini gongur sum ætlað, og eru deildirnar í Eysturoy, Norðoyggjum og í Suðuroynni styrktar við starvsfólki.

Kæruneyndin í almannamálum virkar nú eftir ætlan.

Fleiri tilboð til brúkarar eru komin hesi síðstu árini. Búfelagsskapur fyri evnaveik og vardi verkstaðurin "Stíggjur" lat upp í Runavík í 1993.

Dagheimið á Berjabrekku í Havn, "Virkni", lat upp í fjør, og búfelagsskapur/umlættingarheim fyri evnaveik í Suðuroynni verður liðugt í ár. Á dagstovninum í Sørvági er umlætting og

onnur tilboð fyri evnaveik.

Nýbyggingin av Suðuroyar sjúkrahúsi er nú komin undir land, og umvælingararbeiði í gamla sjúkrahúsinum verður nú framt. 10 mió. kr. verða í ár brúktar til umvælingar á Landssjúkrahúsinum.

Við munandi at minka um vinningin hjá apoteksverkinum, eru tiltøk framd fyri at lata heilivágsprísin bíligari.

Landsstýrið legði f vár uppskot fyri tingið um eina rammulóg fyri almannaøkið. Uppskotið er nú burturdottið. Uppskot til rammulóg fyri heilsuøkið er eisini gjørt.

Støðan hjá sethúsaeigarum hevur verið nógv frammi seinasta árið, og nógv hevur verið tosað um, hvat kann gerast fyri at hjálpa teimum, sum eru illa fyri. Á nýggjárinum kom úrslitið av samráðingunum millum fíggjarstovnarnar, sum Húsalánsgrunnurin tók stig til eftir áheitan frá landsstýrinum. Úrslitið var, at rentan fall á øllum veðrættarstigum, at avdráttartíðin kundi leingjast upp til 30 ár, eins og møguleiki skuldi gevast fyri um neyðugt at fastfrysta lán uttan rentutilskriving. Í nøkrum førum verður so sjálvsagt eisini neyðugt at avskriva lán upp á sethús. Húsalánsgrunnurin veitir í løtuni ikki lán til nýbygging av sethúsum, tí setbúsatørvurin er nøktaður.

Henda avtala verður av mongum ikki mett sum nóg dygg, men kemst hetta m.a. av, at kommunuskattaprosentið í fleiri kommunum júst um somu tíð fór munandi upp.

Ein onnur orsøk kann vera, at peningastovnarnir ikki tykjast at kunna viðgera málini, so fólk í rímligari tíð fáa síni viðurskifti viðgjørd.

Skúlarnir eru, sum allur almenni sektorurin, merktir av stórum sparingum - sparingarnar eru nú so ógvusligar, at skal sparast meira kann tað bara gerast við at leggja niður skúlar, og lata tey ungu ganga arbeiðsleys í staðin.

Lóggáva í sambandi við lærlingaútbúgvingar er fyrireikað við tí í hyggju at kunna laga seg til umstøðurnar hjá vinnuni í dag.

Lógir um nýggja studentaskúla- og HF-skipan verða lagdar fyri tingið í heyst, so tær kunnu vera galdandi frá 1. august 1995. Nýggja studentaskúlaskipanin er tó fyribils sett í gildi við kunngerð at virka frá 1. august í ár.
Føroya Maskinskúli fer endiliga í egin høli, sum løgtingið samtykti at keypa í vár. Ætlanin er at byrja í nýggju hølunum eftir nýggjár.

Føroya Fornminnissavn hevur fingið rúmlig høli í Hoyvík, so savnið fær munandi betri umstøður at skipa fyri framsýningum.

Møguleikar eru nú fyri at fáa Kirkjubøstólarnar heimaftur, og mong fegnast um, at bátasavnið kemur í tryggari høli.

Ein av okkara mentannardýrgripum, Sandoyarbók og skrivliga tilfarið hjá Jóannesi í Króki, kemur nú aftur til lands og verður deponerað á Føroya landsbókasavni.

Sjónvarpið hevur eisini fingið nýggj høli til upptøkur av størri sendingum og til umsiting. Sendinetið hjá útvarpinum og sjónvarpinum er farið at eldast, og tí verða nýggjar tløgur neyðugar.

Eingin endalig loysn er enn funnin á størsta trupulleikanum hjá kommununum - tí ovurstóru skuldini.

Landsstýrið vónaði og roknaði við, at ein loysn fór at verða funnin í seinasta lagi miðskeiðis í hesum árinum. Neyðuga lógarsmíðið varð gjørt til tess at røkka hesum málinum við løgtingslógini um kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan veðhaldsgrunn v.m.

Tíverri hava samráðingarnar um umleggingina av kommunuskuldini drigið út. Men av teimum upplýsingunum, sum landsstýrið hevur fingið, verður framvegis roknað við, at ein loysn verður funnin í hesum árinum og innan rímiliga tíð.

Ein avleiðing av stóru kommunuskuldini er, at neyðugt hevur verið at hækka kommunuskattaprosentini fyri 1994 munandi, úr 18,22% í miðal fyri landið í 1993 til 21,27% í 1994.

Av gongdini higartil í ár og útfrá teimum útrokningum, sum umsitingin í landsstýrinum hevur gjørt, varð roknað við, at kommununar fóru at fáa væl meira inn í kommunuskatti enn ætlað, tá fíggjarætlanirnar vóru lagdar. Landsstýrið metti, at tær meirinntøkur, sum kommununar eftir hesum fingu, áttu at koma borgarunum til góðar í teimum kommunum, hetta var møguligt.

Landsstýrið gjørdi tí av við heimild í nevndu løgtingslóg at lækka kommunuskattaprosentið í nøkrum kommunum. Skattaprosentið varð lækkað í 16 kommunum í miðal 0,87%, soleiðis at endaliga miðal kommunuskattaprosentið fyri 1994 kom niður á 20,40%.

Viðvíkjandi samanleggingum av kommunum er at siga, at landsstýrið sendi øllum kommununum bræv við áheitan um at taka upp samráðingar við aðrar kommunur um samanleggingar ella tættari samstarv.

Landsstýrið hevur lagt dent á, at Strandferðslan verður í so stóran mun sum gjørligt rikin út frá handilsligum sjónarmiðum. Hesin rakstrarpolitikkur sæst aftur í úrslitinum fyri 1993. Hallið hjá stovninum minkaði 22,9 mió.kr. - úr 60,8 mió.kr. niður í 37,9 mió.kr. í 1993. Tað minkandi virksemið í landinum sæst aftur í inntøkuni hjá Strandferðsluni, ið minkaði 2,3 mió.kr. niður í 65,8 mió. kr. Til tess at lúka nýggju IMO krøvini til ferjur, skal Strandferðslan nýta einar 5 mió. kr. í ár. Hesi arbeiði verða øll gjørd í Føroyum.

Raksturin av skipum, bilum og tyrlu kostaði 21,1 mió. kr. minni, og útreiðslurnar til rentur og avskrivingar minkaðu 6,9 mió. kr.

Raksturin av Bygdaleiðum kostaði 2,3 mió. kr. minni í 1993 og kom niður á 15,5 mió. kr.

Atlantsflog hevur sambært ársroknskapinum fyri 1993 eitt munandi betri rakstrarúrslit enn í 1992, og felagið hevur verið ført fyri at svara hvørjum sítt. Útlitini fyri Atlantsflog eru góð, um felagið fær eins nógv ferðafólk at flyta í 1994 sum í 1993, hetta saman við teimum nú

lægri rentuútreiðslunum, skuldi tað borið í sær, at felagið møgulig[illegible]an geva eitt lítið avlop í 1994. Atlantsflog hevur annars ætlanir um ávís mennandi tiltøk.

Í vár varð raksturin av tyrlutænastuni fluttur frá Strandferðsluni til Atlantsflog, ið kundi reka tænastuna væl bíligari. Avgerðin var framd og riggar væl.

Telefonverkið merkir eisini, at nógv flyta av landinum. Higartil í ár er felagatalið umleið 1000 felagar færri. Hertil er tó at siga, at hóast minni felagatal so er inntøkan í krónum ikki minkað. Eftir at allar útreiðslur eru goldnar og fullar avskrivingar tiknar við, er avlopið fyri 1993 góðar 10 mió. kr., mett avlop fyri 1994 góðar 5,5 mió. kr., og mett avlop fyri 1995 einar 9-10 mió. kr.

Fyribilsavtala er gjørd við Ericsson um at lata útbúnað til tað føroyska telefonnetið, og er setningurin fulldigitalisering fyri allar Føroyar komandi 5 árini.

Rakstrarhallið hjá postverkinum verður í ár væntandi um 3 mió. kr., og verður játtanin á fíggjarlógini sostatt hildin, ein minking í mun til 1993 uppá 1,2 mió. kr.

Virksemið hjá landsverkfrøðinginum er skorið nógv niður í mun til undanfarin ár. Í 1993 var nýtslan 165 mió. kr., meðan nýtslan í 1994 væntandi fer at liggja um 127 mió. kr. Dentur hevur verið lagdur á, at tað virksemið, ið fer fram, er javnt býtt um landið, og at sum mest av fólki fer í arbeiði.

Nýggjur bygnaður er skipaður á umhvørvisnevndarøkinum, soleiðis at kommunurnar nú hava eftirlitið á staðnum, meðan yvirumsjónin og eftirlit við serliga dálkandi virkjum liggur hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Tann heldur fløkta skipanin við óheftum heilsunevndum er sostatt avtikin, samstundis sum reglurnar í heilsusamtyktunum, har nógvar hava staðið óbroyttar síðani 1933, eru gjørdar meira nútíðarhóskandi.

Handilssáttmálarnir við EFTA-londini eru allir undirskrivaðir, og verða sáttmálarnir við Sveits og Eysturríki sum teir seinastu lagdir fyri løgtingið.

Arbeiðið at útvega útflutningsvinnuni rúmari ræsur á ES-marknaðinum er styrkt og verður í løtuni í góðari samvinnu við vinnuna arbeitt við hesum í felagsnevndini. ES hevur biðið um nýggjar samráðingar um sáttmálan í síni heild vísandi til, at eitt ella fleiri av EFTA-londunum verða limir í ES frá 1. januar 1995. Landsstýrið hevur svarað játtandi til nýggjar samráðingar um sáttmálan, so skjótt sum verandi mál í felagsnevndini eru avgreidd.

46. ársfundurin hjá IWC var í ár í Meksiko. Fundurin førdi nærum til eina politiska kreppu Føroya og Danmarkar millum. Orsøkin var, at danski uttanríkismálaráðharrin í síðstu løtu, eftir trýsti frá umhvørvismálaráðharranum, broytti instruksin til sendinevndina á IWC-fundinum. Við hesi broyting brutu danir meginregluna um nýtslu av tilfeinginum á burðartryggum støði.

Landsstýrið royndi undan fundinum í IWC at steðga hesi broyting, men hetta eydnaðist ikki. Eftir fundin hittust uttanríkismálaráðharrin og løgmaður, í eini roynd at finna felags stev í

framtíðar samvinnu á hesum øki, men partarnir komu ikki hvør øðrum nærri. Hesar hendingar bera í sær, at landsstýrið stórliga ivast í, um rætt er hjá føroyingum framhaldandi at taka lut í IWC.

Samarbeiðið í NAMMCO er sera gott.

Norðurlendska samstarvið hevur størri týdning í dag enn nakrantíð, nú onkur tekin eru um, at fleiri Norðurlond fara upp í ES-felagsskapin. Skulu vit ikki gerast heilt avbyrgd í Norðuratlantshavinum er neyðugt at styrkja samstarvið við gomlu brøðralond okkara.

Enn hava vit ikki fullan limaskap í Norðurlandaráðnum; men tað gongur rætta vegin.

Á norðurlandaráðsfundum taka stjórnarleiðararnir í Grønlandi, Álandi og Føroyum nú lut í fundunum við forsætismálaráðharrarnar.

Eftir at hava luttikið á tingsetu á Álandi seinasta heyst var greitt, at vit trý smáu londini máttu gera vart við okkum, skuldu vit hava ávirkan.

Føroyingar tóku stig til ein felags fyrireikandi fund á tingsetuni í Stokkhólmi. Ætlanin var, at hesir fundir millum sjálvstýrandi økini í Norðurlandaráðnum skuldu halda fram og helst víðkast.

Síðani trupulleikarnir í bankunum byrjaðu heystið 1992 hava danir og føroyingar gjørt fleiri avtalur.

Hesar avtalur hava merkt almenna orðaskiftið og politiska arbeiðið nógv hesa tíð, bæði tað at avtalurnar eru gjørdar og innihaldið í teimum.

Men hóast allar hesar avtalur eru góðkendar av fólkatinginum og løgtinginum, so má ásannast, at tær hava verið tyngjandi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.

Fundurin 17. august millum landsstýrið og donsku stjórnina tykist hava stóran týdning og áhuga fyri nógvar føroyingar, hóast evnini, ið viðgerast skulu á hesum fundi, hava verið kend í langa tíð.

Tó vita vit ikki, um óvissan um nýtt landsstýri og um komandi valið hjá dønum kann ávirka fundin. Eg skal tó siga frá, at ikki eru komin nøkur tekin frá donsku stjórnini at broyta skránna ella flyta fundin. Men enn er tíð til hetta komandi tríggjar vikumar og er óvist, um vit ikki hava fingið nýtt landsstýri til ta tíð.

Hóast teir stóru trupulleikarnar, ið hava verið seinasta valskeiðið hevur eydnast at fremja stórar og týðandi lógarbroytingar á flest øllum økjum. Nakrar hava verið nevndar í fyrr hildnum løgmansrøðum, og havi eg í dag nevnt hesar í sambandi við tey ymsu økini. Eg vil tó her taka fram tvey mál, har stórar broytingar eru hendar, sum eg meti hava avgerandi týdning fyri Føroyar í framtíðini.

Tað fyrra er stýrisskipanin og hitt seinna undirgrundin.

Nevndin, sum landsstýrið setti 1. apríl í fjør at kanna stýrisskipanarviðurskifti Føroya, varð liðug við arbeiðið sítt fyrst í 1994.

Við støði í álitinum var uppskot til nýggja stýrisskipanarlóg lagt fyri løgtingið.

Tvinni løgting hava nú samtykt nýggja stýrisskipanarlóg, og lógin er kunngjørd sum løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya, og lógin fær gildi ólavsøkudag 1995.

Tann 24. september 1993 samtykti løgtingið lóg nr. 179 um forkanningar o.m.a. av undirgrund Føroya.

Løgtingið samtykti sama dag uppskot til samtyktar um leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki.

Oljufyrsitingin var skipað sum stovnur undir landsstýrinum og arbeiðsbólkur settur saman við oljufyrisitingini at gera reglur v.m. í samband við seismikkloyvi.

Landsstýrið samtykti 19. apríl í ár at geva Western Geophysical Cooperation tvinni loyvi til seismiskar kanningar í 1994 og 1995. Kanningarnar eru farnar í gongd.

Til tess at fremja ætlan løgtingsins eftir uppskoti til samtyktar hevur landsstýrið eisini valt eina nýggja oljuráðleggingarnevnd, sum m.a. skal gera uppskot til landsstýrið viðv. lóggávu o.ø. Nevndin hevur havt sín fyrsta fund. Arbeiðið verður metti at taka 2-3 ár.

Tá tosað verður um undirgrundina tekur spurningurin seg upp um trætuna við bretar um landgrunsmarkið, sum enn er óloystur. Landsstýrið hevur ta fatan, at síðani samráðingarnar vóru tiknar upp aftur í fjør heyst, hava tær verið seriøsar og virknar frá báðum síðum.

Samráðingarnar eru nú komnar hartil, at tað nú fer at vísa seg, um partarnir kunnu nærkast hvør øðrum, soleiðis at ein semja kann fáast í lag.

Næsti fundur partanna millum verður um mánaðarskiftið august/september; men løgmaður og danski uttanríkismálaráðharrin hava havt fund um hesi viðurskifti, og tá varð avgjørt, at Føroya løgmaður og uttanríkismálaráðharrin hittast í august at viðgera málið nærri. Fundardagurin er ikki ásettur enn.

Í ólavsøkurøðuni í fjør málbar eg meg soleiðis: "Høvdu vit á ólavsøku í fjør verið før fyri at sæð inn í framtíðina og sæð, hvat ið fór at henda komandi árið, høvdu flest øll helst øtast við. Tí samfelag okkara hevur neyvan verið fyri størri bakkøstum í so stutta tíð sum seinasta árið."

Men vit mugu í ár ásanna, at trupulleikarnir ikki vóru lidnir á ólavsøkuu í fjør. Føroyska samfelagið hevur verið fyri enn størri bakkøstum síðani tá, og fylgjurnar av hesum síggjast í arbeiðsloysinum, fráflytingini, skattatrýstinum, trupulleikunum hjá nógvum sethúsaeigarum

og harvið trupulleikunum hjá familjunum.

Tá tú hevur verið við í politiska arbeiðinum hesa truplu tíð og hevur seð, hvør gongdin hevur verið, verður tú varin við at vera ov bjartskygd. Men hóast ringu støðuna so eru tó einstakir glottar, sum eisini síggjast í fylgiskjølunum og eru nevndar fyrr í røðuni.

Landingarnar í Føroyum eru farnar upp fyrra hálvárið 1994, lønarútgjaldingarnar í fiskivinnuni á sjógvi og landi hava verið hægri í ár enn í fjør, skattainntøkurnar eru hægri enn væntað, arbeiðsloysið minni, og gjaldsjavnaavlopið er stórt, hóast fall í prísum fyri útflutningi okkara.

Hesi kunnu vera tekin um, at árið 1994 ikki verður so heilt út av lagi, um ikki okkurt heilt óvæntað hendir.

Nógvir trupulleikar eru enn fyri framman: men gott grundarlag skuldi verið lagt hjá nýggjari samgongu at virka á Føroyum og føroyingum at frama.

Farloyvi

Skriv dagf. 10. august 1994 frá Jógvani Durhuus um farloyvi meðan hann er burturstaddur í egnum ørindum. Samtykt við 24-0 atkvøðum, at Heini Holm tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 15. september 1994 frá Vilhelmi Johannesen um farloyvi meðan hann er burturstaddur vegna sjúku. Samtykt við 30-0 atkvøðum, at Mamy Dahl Sørensen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 19. september 1994 frá Óla Jacobsen um farloyvi meðan hann er landsstýrismaður. Samtykt við 29-0 atkvøðum, at Karl Robert Johansen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 18. oktober 1994 frá Ivani Johannesen um farloyvi meðan hann er landsstýrismaður. Samtykt við 26-00 atkvøðum, at Sune Jacobsen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 18. oktober 1994 frá Edmundi Joensen um farloyvi meðan hann er løgmaður. Samtykt við 26-0 atkvøðum, at Atli Hansen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 21. september 1994 frá Finnboga Ísakson um farloyvi meðan hann er burturstaddur í almennum ørindum. Samtykt við 26-0 atkvøðum, at Hildur Patursson tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 27. oktober 1994 frá Jógvani I. Olsen um farloyvi meðan hann er burturstaddur í almennum ørindum. Samtykt við 26-0 atkvøðum, at Jákup Lamhauge tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 1. november 1994 frá Kjartani I. Joensen um farloyvi meðan hann er burturstaddur í egnum ørindum. Samtykt við 21-0 atkvøðum, at Jógvan á Lakjuni tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 2. desember 1994 frá Lisbeth L. Petersen um farloyvi meðan hon er burturstødd í egnum ørindum. Samtykt við 28-0 atkvøðum, at Kaj Leo Johannesen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 12. desember 1994 frá Óla Breckmann um farloyvi meðan hann er burturstaddur í almennum ørindum. Samtykt við 24-0 atkvøðum, at Birgir Danielsen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 14. desember 1994 frá Jóannesi Eidesgaard um farloyvi meðan hann er landsstýrismaður. Sverre Midjord boðar í skriv frá, at hann ikki kann møta á tingi vegna sjúku. Samtykt við 26-0 atkvøðum, at Mikkjal Sørensen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 21. desember 1994 frá Jógvani I. Olsen um farloyvi meðan hann er burturstaddur í almennum ørindum. Samtykt við 22-0 atkvøðum, at Jákup Lamhauge tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 2. januar 1995 frá Vilhelmi Johannesen um farloyvi meðan hann er burturstaddur vegna sjúku. Samtykt við 25-0 atkvøðum, at Mamy Dahl Sørensen tekur sætið á tingi.

2. januar 1995 setir løgtingsformaðurin undir atkvøðugreiðslu, at Sverre Midjord tekur sætið á tingi fyri Jóannes Eidesgaard, meðan hann er landsstýrismaður. Samtykt við 25-0 atkvøðum.

Skriv dagf. 2. januar 1995 frá Helenu Dam á Neystabø um farloyvi meðan hon er burturstødd í egnum ørindum. Samtykt við 27-0 atkvøðum, at Ronald Poulsen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 1. januar 1995 frá Jákupi Olsen um farloyvi meðan hann er burturstaddur vegna sjúku. Samtykt við 27-0 atkvøðum, at Reinhold Nielsen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 15. januar 1995 frá Mariu Hansen um farloyvi meðan hon er burturstødd vegna sjúku. Samtykt við 25-0 atkvøðum, at Terje Davidsen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 24. januar 1995 frá Mariu Hansen um farloyvi meðan hon er burturstødd í almennum ørindum. Samtykt við 24-0 atkvøðum, at Terje Davidsen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 30. januar 1995 frá Lassa Klein um farloyvi meðan hann er burturstaddur vegna sjúku. Samtykt við 24-0 atkvøðum, at Eliesar Høj tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 2. februar 1995 frá Lisbeth L. Petersen um farloyvi meðan hon er burturstødd í egnum ørindum. Samtykt við 24-0 atkvøðum, at Pauli Ellefsen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 12. februar 1995 frá Helenu Dam á Neystabø um farloyvi meðan hon er burturstødd í almennum ørindum. Samtykt 17. februar 1995 við 25-0 atkvøðum, at Sólborg Dulavík tekur sætið á tingi. Ronald Poulsen hevur í skrivi dagf. 15. februar 1995 boðað frá, at hann ikki kann møta á tingi.

Skriv dagf. 28. februar 1995 frá Kristiani Magnussen um farloyvi meðan hann er burturstaddur í almennum ørindum. Samtykt við 27-0 atkvøðum, at Ernst Hansen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 18. april 1995 frá Ingeborg Vinther um farloyvi meðan hon er burturstødd í egnum ørindum. Samtykt við 29-0 atkvøðum, at Hjalmar Thomsen tekur sætið á tingi. Hildebjørg Brattalíð, sum er næst á listanum, boðar í skrivi dagf. 18. april 1995 frá, at hon ikki kann møta á tingi.

Skriv dagf. 1. april 1995 frá Jógvani I. Olsen um farloyvi vegna sjúku. Samtykt við 23-0 atkvøðum, at Jákup Lamhauge tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 24. april 1995 frá Óla Breckmann um farloyvi meðan hann er burturstaddur í almennum ørindum. Samtykt við 20-0 atkvøðum, at Anfinn V. Hansen tekur sætið á tingi. Birgir Danielsen, sum er næsti maður á listanum, boðar í skrivi frá, at hann ikki kann møta á tingi.

Skriv dagf. 21. april 1995 frá Jenisi av Rana um farloyvi meðan hann er burturstaddur í egnum ørindum. Samtykt við 21-0 atkvøðum, at Heini Lützen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 2. mai 1995 frá Signari á Brúnni um farloyvi meðan hann er burturstaddur í egnum ørindum. Samtykt við 21-0 atkvøðum, at Árni Joensen tekur sætið á tingi. Hans Tausen Olsen, sum er næstur á listanum, boðar í skrivi frá, at hann ikki kann møta.

Skriv dagf. 11. mai 1995 frá Ingeborg Vinther um farloyvi meðan hon er burturstødd í egnum

ørindum. Samtykt við 26-0 atkvøðum, at Hildebjørg Brattalíð tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 22. mai 1995 frá Óla Breckmann um farloyvi meðan hann er burturstaddur í almennum ørindum. Samtykt við 20-0 atkvøðum, at Anfinn V. Hansen tekur sætið á tingi.

Skriv dagf. 23. mai 1995 frá Tordi J. Niclasen um farloyvi meðan hann er burtustaddur í egnum ørindum. Samtykt við 20-0 atkvøðum, at Petur Jacobsen tekur sætið á tingi.

1 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1994, mikudagin 3. august legði Thomas Arabo, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap verður gjørd henda broyting:

§ 27 verður soljóðandi:

"Heildarkvotur á landleiðunum fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verða ásettar soleiðis fyri hesar fiskastovnar fyri tíðarskeiðið frá 1. september 1994 til og við 31. august 1995:

Tons rund vekt:	
Toskur á Føroya Banka	1.400
Toskur á landgrunninum	6.800
Hýsa	6.000
Upsi	41.500
Kongafiskur	13.300"

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om erhvervsmæssigt fiskeri.

§ 1.

I lagtingslov nr. 28 af 10. marts 1994 om erhvervsmæssigt fiskeri foretages følgende ændring:

§ 27 affattes således:

"Totalkvoter på fiskeriterritoriet for fiskefartøjer under færøsk flag fastsættes således for nedenfornævnte fiskebestande for perioden fra 1. september 1994 til og med 31. august 1995:

Tons rund vægt:	
Torsk på Føroya Banka	1.400
Torsk på Færøplateauet	6.800
Kuller	6.000
Sej	41.500
Rødfisk	13.300"

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Landsstýrið legði uppskot fram um vinnuligan fiskiskap beint fyri jól í løgungsmáli nr. 51 dagsett hin 18. desember 1993. Løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap kom í gildi hin 16. mars 1994.

§ 2, stk. 4 nevndin, sum skal ráðgeva landsstýrinum í spurningum, um lógin um vinnuligan fiskiskap livir upp til sínt endamál, hevur gjørt tilmæli til landsstýrið um broytingar í lógini.

Sitandi landsstýri hevur avgjørt ikki at leggja nakað uppskot til broytingar fyri tingið.

Hetta má eitt nýskipað landsstýri taka støðu til. Frágreiðingin frá § 2. stk. 4 nevndini er hjáløgd.

Kvoturnar í lógini um vinnuligan fiskiskap eru tiknar frá uppskotinum hjá bygnaðarnevndini, sum nýtti ráðgevingina frá ICES í 1993 fyri árið 1994. Út frá hesi ráðgeving varð løgd ein 5 ára ætlan fyri at byggja upp aftur toska- og hýsustovnarnar. Hetta var gjørt við í 5 ár at áseta lágar kvotur fyri tosk og hýsu.

Orsøkin var, at fiskifrøðingarnir gjørdu vart við, at gýtingarstovnarnir av toski og hýsu vóru lægri enn nakrantíð fyrr, og kundi hetta hava avleiðingar fyri, hvussu nógv kom undan á hvørjum ári. Teir áttu tí skjótast gjørligt at verða bygdir upp til eitt støði, sum vit av søguligum royndum vita hevur givið góða gýting. Fyri upsa varð skotið upp at fiska heldur omanfyri tað, sum vanliga verður roknað hitt besta lívfrøðiliga, tí hesin stovnur var rímiliga væl fyri. Fyri longu, brosnu, blálongu og kongafisk varð skotið upp at fastleggja kvoturnar í 5 ár á miðaltalinum í veiðuni 1988-1992.

Landsstýrið skrivaði Millumlandaráðnum fyri Havrannsóknir, ICES, hræv um hesa ætlan og bað teir meta um hana. Hetta hevur ICES síðani gjørt.

Nýggja ráðgevingin hjá ICES lá fyri fyrst í juni 1994. Hetta er ráðgeving fyri eitt ár, og bara lívfrøðilig sjónarmið liggja til grund. ICES hevur gjørt eina váðakanning (risikoanalyse) av 5 ára ætlanini fyri tosk og hýsu. Kanningin vísir, at við núverandi lágu tilgongdini er líkið, sum bendir á, at gýtingarstovnarnir av toski og hýsu eru uppafturbygdir í 1998. Fyri upsa er ikki tilfar til tílíka kanning, og har skjóta teir upp eitt nógv lægri veiðutrýst, og tískil lægri kvotu enn bygnaðarnevndin skeyt upp.

Samantikið siga teir, at verður bert hugt eitt ár fram, so átti eingin fiskiskapur at verið eftir toski og hýsu í 1995 og kvotan av upsa átti at verið skorin niður í 22.000 tons (móti 42.000).

Heildarkvotur skulu sambært § 22 í lóg um vinnuligan fiskiskap ásetast í seinasta lagi 10. august. Landsstýrið skal sambært § 22 hava ráðgeving frá Stovnsrøktarnevndini, sum er ásett í § 5, stk. 9, og Fiskirannsóknarstovuni. Stovnsrøktarnevndin og Fiskirannsóknarstovan hava sent landsstýrinum tilmæli ávikavist 22. og 25. juli 1994. Frágreiðingarnar hjá teimum og tilmæli eru hjáløgd.

Fiskirannsóknarstovan sigur seg vera samda við stovnsmetingunum hjá ICES og mælir til, at MLV fyri tosk og hýsu verða ásett so lágt sum praktisk møguligt og undir ongum umstøðum hægri enn mælt til av bygnaðarnevndini. Fyri upsa verður eisini mælt til, at MLV verður sett so lágt sum gjørligt og helst ikki meira enn 36.000 tons, sum er ein lækking upp á 6.000 tons. Hetta tal ger, at gýtingarstovnurin av upsa ikki minkar. Fyri kongafisk verður mælt til eitt MLV upp á 15.000 tons, sum er ein hækking upp á 500 tons.

Stovnsrøktarnevndin hevur kannað tilfarið frá fiskifrøðingum, frásagnir og metingar hjá fiskimonnum og eginar royndir. Teir mæla til at áseta hesi MLV: 1400 tons fyri tosk

á Føroya Banka 9.800 fyri tosk á landgrunninum, 8.500 fyri hýsu á landgrunninum, 40.000 fyri upsa og 15.000 fyri kongafisk. Tey hægru tølini fyri tosk á landgrunninum og hýsu eru serliga grundað á, at fiskurin í 1993 var betur fyri enn árini undan, so sama tal av fiski gevur størri tonsatal.

Harumframt leggur stovnsrøktarnevndin dent á fleiri fyribrigdi, sum benda á, at bati er í viðurskiftunum í náttúruni, sum geva grund til at vænta eina betri gongd, enn stovnsmetingarnar sýna. Stovnsrøktarnevndin skjýtur tí upp, at hesir batar koma fiskiflotanum til góðar í 1994/1995 við at økja kvoturnar. Fyri upsa skjýtur nevndin upp at lækka MLV 2.000 tons og fyri kongafisk at hækka MLV 500 tons.

Landsstýrið heldur, at yvirhøvur er semja um grundleggjandi stovnsmetingarnar, men munur er á tulkingum í smærri lutum. Fiskifrøðingarnir leggja serliga dent á, at gýtingarstovnarnir í toski, hýsu (og lutvís upsa) eru smáir, at vandi kann vera fyri at koma inn í eina ónda ringrás, har ein ov lítil gýtingarstovnur ikki er førur fyri at framleiða stórar og miðal árgangir.

Hóast lívfrøðiliga ráðgevingin hjá ICES og Fiskirannsóknarstovuni er sera dapurskygd, heldur landsstýrið ikki orsøk vera til at broyta ta ætlan, sum lá aftan fyri áseting av kvotum fyrr í ár: at byggja upp aftur toska- og hýsustovnin skjótast gjørligt. Landsstýrið skilir uppskotið hjá stovnsrøktarnevndin so, at hon mælir til at taka meira burtur úr toska og hýsustovnunum beinanveg heldur enn at lata benda bata koma stovninum til góðar.

Í hugsanini at byggja stovnarnar uppaftur yvir fleiri ár var eisini, at rætt var at hava eina javna kvotu nøkur ár, so fiskivinnan kendi treytirnar eina tíð fram, heldur enn at flyta kvotuna upp og niður hvørt ár. Verður uppskot stovnsrøktarnevndarinnar fylgt, heldur landsstýrið tað vera størri vanda fyri, at kvotan okkurt árið má lækkast í tíðarskeiðinum, arbeitt verður við at byggja gýtingarstovnarnar uppaftur á eitt minstamark.

Út frá hesum skjýtur landsstýrið upp, at hildið verður fast um ætlanina at byggja toska- og hýsustovnin upp so skjótt sum gjørligt og at MLV og heildarkvotur tey næstu 5 árini verða tølini niðanfyri, ið eru tey somu tølini, sum løgtingið samtykti 10. mars 1994, tó nú fyri eitt heilt kvotuár. Hetta verður eisini gjørt tí, at sitandi starvslandsstýrið ikki heldur tað vera rætt at broyta politiska ætlanir, sum lógu sum grund fyri avgerðunum um MLV og kvotur fyrr í ár:

	Føroysk heildarkvota, rund vekt, tons	MLV rund vekt, tons
Toskur, landgrunnurin,	6.800	7.000
Toskur, Føroya Banki	1.400	1.400
Hýsa	6.000	6.200
Upsi	41.500	42.000
Kongafiskur	13.300	14.500

1. viðgerð 5. august 1994. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 10. august 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 3. august 1994 og eftir 1. viðgerð tann 5. august 1994 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini fingið skriv frá Klaksvíkar Útróðrarfelag og Føroya Skipara- og Navigatørfelag viðvíkjandi lógini um vinnuligan fiskiskap. Frammanundan hevur fiskivinnunevndin fingið skriv frá felagnum "Trolskip" og Føroya Reiðarafelag um lógina um vinnuligan fiskiskap og hevur nevndin viðgjørt hesi skriv.

Eisini hevur nevndin undir viðgerðini frá Fiskivinnuumsitingini fingið taltilfar yvir fiskiskapin frá 15. mars 1994 býtt á ymisku bólkarnar, sum eru undir kvotaskipanini, eins og fulltrúi á Fiskivinnuumsitingini hevur verið á fundi við nevndina og greitt frá hesum tilfari.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ingeborg Winther, Jógvan I. Olsen, John Petersen, Kjartan I. Joensen, Henrik Old og Heini O. Heinesen) mælir til, at heildarkvotan fyri tosk á landgrunninum verður sett til 8.500 tons og fyri tosk á Føroya Banka verður heildarkvotan sett til 1.000 tons. Meirilutin vísir á uppgerð yvir fiskiskapin hjá føroyskum skipum á Føroyalciðini fyrra hálvár 1993 og fyrra hálvár 1994 og er fiskiskapurin munandi hægri í 1994. Eisini vísir meirilutin á tilmæli frá Stovnsrøktarnevndini, sum mælir til at ásetta kvotuna fyri tosk á landgrunninum 3.000 tons hægri enn uppskot landsstýrisins. Við omanfyri nevndu broytingum mælir meirilutin tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verða "1.400" og "6.800" broytt til "1.000" og "8.500".	I § 1 ændres "1.400" og "6.800" til "1.000" og "8.500".

Minnilutin (Jákup Joensen) mælir til, at tað sum er meira til av toski á landgrunninum í ár eigur at koma fiskastovninum til góðar og ikki býtast út til fiskivinnuna og tekur tí undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

John Petersen og Kjartan I. Joensen hava hesar viðmerkingar: Undir I. viðgerð mælti framsøgumaður Fólkafloksins til at taka undir við tilmælinum hjá Stovnsrøktarnevndini, men mett verður, at ikki fæst meirilutu í tinginum fyri hesi tilráðing og verður tí tikið undir við meirilutanum.

Soleiðis sum lógin um kvotuskipan virkar og verður umsitin, hevur hon óhepnar avleiðingar fyri fiskiskapin við Føroyar, bæði fyri fiskimenn og tann, ið skal umsita skipanina.

Teir fiskastovnar, ið lógin mest var gjørd fyri at varðveita og uppbyggja aftur, hava vit fiskað alt ov nógv av í mun til tað TAC, ið loyvt varð at fiska. Tann fiskastovnur, ið vit hava loyvi at fiska mest av og sum hevur skapt størst virksemi á landi, er ikki møguligur at fiska eftir lógini uttan so, at vit bróta lógina. Hesum kan eitt land ikki liva við, ið hevur alla sína inntøku frá fiskiskapi, tað má verða so at vit kunnu útnytta allar stovnar optimalt uttan at vit skulu tvinga hvønn fiskimann at verða lógarbrótara ella at vit skulu verða noyddir at seta eitt eftirlit á stovn sum einki av teimum londum, ið hava havt hesa skipan galdandi í longri ella styttri tíð, hava klárað.

Vit skulu ikki her koma inn á allar teir vansar, ið lógin hevur og sum skuldi verið broytt heinanvegin, men heldur mæla til at øll lógin verður tikin til viðgerðar av nýggjum við tí fyri eyga, at fáa eina betri og liðiligari skipan. Tí verður sett fram uppskot til samtyktar, har álagt verður komandi landsstýrið/samgongu, saman við vinnuni, at taka málið sum skjótast til nýggja viðgerð.

Samsvarandi frammanfyri standandi, seta **John Petersen** og **Kjartan I. Joensen** fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður komandi landsstýrið/samgongu, saman við vinnuni, sum skjótast, at taka løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap til nýggja viðgerð.

Henrik Old hevur hesa viðmerking: Framsøgumaður Javnaðarfloksins, Henrik Old, gjørdi undir I. viðgerð vart við, at Javnaðarflokkurin var mest hugaður fyri at taka undir við tilráðingini hjá Stovnsrøktarnevndini. Javnaðarflokkurin leggur tó stóran dent á at so stórur meirihluti sum gjørligt samtykkir kvotulógina og kann tí taka undir við meirilutatilráðingini, sum liggur heldur lægri fyri tosk enn Stovnsrøktarnevndin metir, men nakað hægri enn Fiskirannsóknarstovan.

Henrik Old ásannar, at hjá teimum, sum hildu kvotulógina verða eitt amboð at minka um veiðutrýsti, hevur tað eydnast í ólukku mát. Ein stórur partur av tí flota, sum

"okkara banki" tíggjar, hevur ligið, eisini áðrenn kvotulógin varð sett í gildi, og liggur framhaldandi. Samtíðis sum úrslitið í samfelagnum annars er hareftir. Hyggja vit at miðalaldrinum á okkara fiskiflota, vísir tað seg at fyri stállínuskipini er miðalaldurin um 30 ár, meðan miðalaldurin á feskfiskartrolarunum er farin um 20 ár. Hjá størra útróðrartlutanum er miðalaldurin heili 40 ár - so ikki er vandi fyri, at vit missa henda partin av flotanum, orsakað av, at ikki fæst innflutningsloyvi til so gomul skip í okkara grannalondum. Verri gekk við okkara nýggja fiskiflota, hvar størri parturin er farin av landinum. Vit hava ikki bara mist nógvan pening uppá hesi skip, men eisini tað sum verri er, vit mistu eisini skipini.

Formaðurin í rágevandi nevndini hjá forsætismálaráðnum segði í fjølmiðlunum í sístu viku, at fiskiflotin við Føroyar framvegis er ov stórur. Og tá "okkara banki" saman við landsumsitingini sita hendur í favn, meðan okkara stoltastu skip verða givin burtur, tá má ólukkan verða fullkomin, serliga harmuligt er hetta tá talan er um skip, ið annars hava klárað sínar skyldur. So í dag er eingin í iva um, at fleiri partar hava sligið seg saman, fyri á ein óhugnaligan hátt at sleppa okkum av við okkara bestu skip.

Betur gekk tá talan var um at bjarga stórhandlum í høvuðsstaðnum, bert í tí cina førinum var talan um at avskriva meira enn hálvthundrað milliónir úr "okkara banka", sum hevði verið nokk til at bjarga fleiri av okkara góðu skipum. Umfram at henda avgerð samstundis slær beinini undan einum stórum parti av bygdahandlunum. Umboð Javnaðarfloksins má ásanna, at omanfyri nevndu hendingar, saman við einum alt ov høgum skattatrýstið hava ikki økt um hugin hjá føroyska fiskimanninum at búðleikast her og við ví miðalaldri okkara fiskiskipafloti hevur í dag, verður helst ikki neyðugt við kvotulóg langa tíð afturat.

Eisini verður víst á, at um ikki verður fylgt neyvt við veiðuni seinra partan av kvotuárinum, so kann vandi verða fyri, at kvotan av toski er nýtt, tá útróðurin frá smábygdunum byrjar út á næsta vár. Spurningurin er um ikki kundi funnist onnur skipan fyri tey pláss, har einans verður rikin útróður við smábátum um summarið.

Henrik Old átalar eins og grein 2 nevndin ger, at tilmæli frá meirilutanum í fiskivinnunevndini til 3. viðgerð av lógaruppskotinum, ikki er fylgt, tá talan er um mótrokning, um veitt verður út um kvotuna.

Heini O. Heinesen hevur hesa viðmerking: Hetta er fyrstu ferð, at løgtingið skal áseta kvotur eftir lógini um vinnuligan fiskiskap. Sum formaður í løgtingsins fiskivinnunevnd, tá lógin á fyrsta sinni varð viðgjørd í nevndini og samtykt av løgtinginum, havi eg við stórum áhuga fylgt gongdini síðani lógin fór at virka og tað eru ikki so fáar samrøður eg havi havt við fiski- og útróðrarmenn og fiskivinnufeløg, umboðandi ymiskar veiðuhættir, so sum lína, snella og trol.

Eg kann ikki siga annað, enn at eg havi verið sera spentur uppá hesa viðgerðina, ikki tí at eg haldi eina kvotuskipan verða tann besta háttin at regulera fiskiskapin á Føroyagrunninum við. Men eitt liggur púra fast, at tann gongd sum er farin fram seinastu árini kundi ikki halda fram. Við einum so skilaleysum fløgupolitikki í veiðufør

og virkir, sum bert kundi enda í fíggjarligum kaos, serliga tí at tilfeingið ikki kundi bera kapitalkostnaðin. Sostatt varð neyðugt at økja um veiðutrýstið ár um ár, samstundis sum skuldin í rakstrargøgnunum vaks við óavmarkaði ferð.

Fiskivinnuráðið boðaði frá longu í 1980, at flotin var 1/3 ov stórur. Her er sjálvandi talan um veiðuorkuna - veiðutrýstið. Tað er tí av stórsta týdningi hvussu flotin er samansettur og hvussu stórt veiðutrýstið verður.

Bygnaðarnevndin, sum skuldi siga okkum hvussu veiðast skuldi í framtíðini, sambært avtaluna frá 1. februar 1993 í millum dansku stjórnina og Føroya landsstýri, slapp sær undan at siga nakað um flotan, kotu í staðin og áleygi Føroya løgtingi at seta eina kvotuskipan í gildi fyri Føroyar.

Sagt varð at flotin 1. juli 1993 var hóskandi. At hetta var skeiv meting er øllum greitt í dag, nú kvotan er uppi áðrenn hálvárið er hálvrunnið. Tað er tí av allra størsta týdningi, at flotin er í mun til tað, sum veiðast skal, um ein kvotuskipan skal virka.

At brúka eina kvotuskipan at regulera flotan við í einum landi sum livir 100% av fiskivinnu er einki minni enn eitt slag av deyðadóini. Um bygnaðarnevndin í staðin hevði sagt hvussu flotin skuldi verða samansettur, var ikki neyðugt við nakrari kvotuskipan.

At bygt fiskastovnin uppaftur høvdu vit klárað við tekniskum reguleringum, so sum trolfríum økjum, um hesi vórðu hildin trolfrí árið runt. Hetta hevur vinnan eisini tikið undir við, sambært kunngerð nr. 52 frá 10. januar 1994 - 4 trolfrí økir á landleiðini. Harafturat er vinnan ímóti eini kvotuskipan.

Men tað sum eg førdi fram undir 1. viðgerð av lógini um vinnuligan fiskiskap, stendur við enn í dag. Latið okkum skipa so fyri, at vit fáa sum frægast burtur úr, nú vit vórðu noyddir at fylgja tilráðingini hjá bygnaðarnevndini, sambært avtalurnar sum gjørdar eru.

Tað sum eg leggi stóran dent á í lógini er býtið í grein 28 ímillum veiðubólkarnar. Hetta býtið ger at ein veiðiháttur ikki kann eta ein annan veiðuhátt upp.

Eisini er tað av allra stórsta týdningi, at tað ikki blivu nakrar handilskvotur, tí so kann vendast aftur úr oyðimørkini við kvotunum.

Soleiðis sum politiska støðan er í landi okkara í dag, fari eg ikki at koma við teimum broytingum, sum eg kundi hugsa mær, um val ikki varð útskrivað.

2. viðgerð 10. august 1994. Broytingaruppskot meirilutans samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð 10. august 1994. Endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

Lóg nr. 105 frá 24. august 1994.

FL jnr. 1501-7/94.

2 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

Ár 1994, mikudagin 3. august legði Finnbogi Ísakson, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k u t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, 3. stk., litra h) verður orðað soleiðis:
"Útleiga, uppsiting og umsiting av fastari ogn. Tó er útleiga av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.t. avgjaldsskyldug og útleiga av tjaldingarakfars- og reklamustaði."

2) Í § 12, 1. stk., verður sum nýtt litra j) sett: "Útleiga av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.t."

3) Í § 27, verður sum nýtt 10. stk. sett: "Innflutningur av fiski, skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum vatndýrum (sbr. 3. kap. í toll- og vøruskránni) og innflutningur av ídnaðarfiski (sbr. vørunummar 05.11.91.91-05.11.91.99 í toll- og vøruskránni) til útflutningsfyritøkur, hvørs søla beinleiðis ella óbeinleiðis í høvuðsheitum er til útlond, kann fara fram, uttan at meirvirðisgjald verða at rinda í samband við innflutningin."

§ 2.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om meromsætningsafgift foretages følgende ændringer:

1) § 2, 3. stk., litra h), affattes således: "Udlejning, bortforpagtning og administration af fast ejendom. Afgiftspligtig er dog udlejning af værelser i hoteller, gæstgiverier o.l. samt udlejning af camping-, parkerings- og reklameplads."

2) I § 12, stk. 1, indsættes som nyt litra j): "Udlejning af værelser i hoteller, gæstgiverier o.l."

3) I § 27 indsættes som nyt stk. 10: "Indførsel af fisk, krebsdyr, bløddyr, og andre hvirvelløse vanddyr (jfr. kap. 3 i told- og varefortegnel-sen) og indførsel af industrifisk (jfr. pos. 05.11.91.91-05.11.91.99 i told- og varefortegnelsen) til eksportvirksomheder, hvis afsætning direkte eller indirekte overvejende sker til udlandet, kan ske, uden at der skal svares afgift i forbindelse med indførslen."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

bekendtgørelse.

Viðmerkingar:
Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald er:

Broyting nr. 1) og 2) At leiga kamar út
Broyting nr. 3) At flyta fisk inn v.m.

Viðv. 1) og 2) At leiga kamar út:
At leiga út kamar á hotelli, gistingarhúsi o.t. var við seinastu lógarbroyting undantikið avgjaldsskylduni, og tað hevði ta avleiðing, at meirvirðisgjaldsútreiðslurnar av gisting ikki kundu verða drignar frá í roknskapinum. Í hesum uppskoti er gisting á hotelli v.m. sett í § 12.

Sambært § 12 kunnu ymiskar latingar av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum verða hildnar uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu. Her er talan um, at ein prinsipielt meirvirðisgjaldsskyldug søla sleppur undan meirvirðisgjaldi. Virkið fær á henda hátt sonu fyrimunir sum "meirvirðisgjaldsskyldug søla", t.e. frádrátt fyri meirvirðisgjald í samband við keyp at nýta til tænastuna (eitt nú reingerð, upphiting, el).

3) At flyta fisk inn v.m.
Av lógartekniskum ávum datt hetta stk. burtur í seinastu lógarbroyting. Verður tí við hesum sett innaftur.

1. viðgerð 5. august 1994. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 10. august 1994. Uppskotið samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 10. august 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lóg nr. 104 frá 16. august 1994.

FL jnr. 2530-1/91.

3 Broyting í arbeiðsloysisskipanini

Ár 1994, mikudagin 3. august legði Helena Dam á Neystabø, løgtingsmaður, vegna sjálvstýrisflokkin og verkamannafylkingina fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya Løgting samtykkir at broyta arbeiðsloysisskipanina soleiðis, at rullandi útgjaldið verður avtikið, og at dagatalið, ein kann fáa veiting úr skipanini, verður avtikið ella longt.

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig í hesum sambandi, herundir at skipa fyri at neyðug figging verður fyri lógarbroytingini, og at leggja uppskot til lógarbroyting fyri Løgtingið í seinasta lagi 10. august í ár.

Viðmerkingar:

Verkamannafylkingin og Sjálvstýrisflokkurin heita við hesum á Føroya Løgting um beinanvegin í størsta álvara at viðgera støðuna hjá teimum arbeiðsleysu og arbeiðsloysisskipanina.

Tey fyrstu arbeiðsleysu eru longu farin úr skipanini, og umleið 900 til 1000 fara úr skipanini nú í august, tí tey hava fingið útgoldið arbeiðsloysisstuðul í 504 dagar. Tær broytingar, sum verða gjørdar, eiga tí eisini at fevna um tey, sum eru dottin úr arbeiðsloysisskipanini.

Bíðitíðin hjá teimum, ið nú noyðast at søkja um forsorgarhjálp er í dag tveir til tríggjar mánaðir. Væntandi verður henda bíðitíðin longri framefitir, áðrenn tey arbeiðsleysu fáa nakað útgjald frá Almannastovuni. Henda støða er ótolandi, og nývalda løgtingið má tí taka neyðug stig beinanvegin.

Sum eina bráfeingisloysu ber til at broyta arbeiðsloysisskipanina soleiðis, at rullandi útgjaldið verður avtikið og lagt fast í mun til inntøkuna, áðrenn arbeiðsloysið varð staðfest eins og dagatalið ein kann vera í skipanini kann verða avtikið.

Uppskotsstillararnir vita, at hesin spurningur fer at vera borin upp á mál, tá ið landsstýrið fer at tingast við dansku stjórnina tann 17. august í ár. Men bíðast kann ikki eftir hesi avtalu. Bíðast kann heldur ikki eftir nýggjari samgongu, nú samgongusamráðingarnar tykjast at ganga striltið.

Livikorini hjá teimum arbeiðsleysu mugu tryggjast nú. Eisini hevur hetta skund til tess at steðga ella tálma fólkaflytingini, sum er um at týna okkum sum tjóð.

Mint verður á vallyftini hjá øllum flokkum, at arbeiðsloysisskipanin mátti broytast sum skjótast eftir valið.

Tí seta Verkamannafylkingin og Sjálvstýristlokkurin fram hetta uppskot.

1. viðgerð 5. august 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 10. november 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Sjálvstýristlokkinum og Verkamannafylkingini tann 3. august 1994 og eftir 1. viðgerð tann 5. august 1994 beint í fíggjarnevndina.

Málið hevur verið umrøtt í fíggjarnevndini tann 31. oktober 1994, men tá fíggjarnevndin hevur fingið áheitan um at taka málið aftur, verður málið beint aftur í tingið soleiðis, at uppskotsstillararnir kunnu taka málið aftur.

2. viðgerð 11. november 1994. Málið varð afturtikið.

4 Fíggjarløgtingslógin fyri árið 1. januar - 31. desember 1995

Ikki framlagt.

5 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

Ár 1994, mánadagin 19. september legði Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT

til

<u>løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald</u>.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1994 um meirvirðisgjald við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

1) § 12 verður sett sum nýtt litra 1:

"Søla av seyða- og neytakjøti og mjólk frá framleiðara."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. oktober 1994.

<u>lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgifter</u>.

§ 1.

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om meromsætningsafgift med senere ændringer foretages følgende ændring:

1) § 12 indsættes som nyt litra 1:

"Salg af fåre- og oksekød og mælk fra producent."

§ 2

Denne lov træder i kraft 1. oktober 1994.

Viðmerkingar:

Orsøkin til at vit fingu nýggja avgjaldsskipan (M.V.G.) var, at vit høvdu gjørt handilssáttmála við E.S., sum innibær, at vit bundu okkum til at gera eina avgjaldsskipan, sum javnsetti føroyska framleidda vøru javnbjóðis innfluttari framleiðslu.

Tí fingu vit M.V.G. frá 1. januar 1993.

Tað var áskoðan landsstýrisins, at vit skuldu hava eina so reina skipan sum gjørligt, t.v.s. at vit skuldu helst ongi undantøk gera, soleiðis at allar vørur skuldu verða M.V.G. skyldugar.

Síðani hevur løgtingið sammtykt fleiri undantøk.

Tað var ikki neyðugt sambært handilsavtaluni við E.S. at gjalda M.V.G. av tænastunum. Eisini er gjørd eitt undantak í avtaluni viðvíkjandi landbúnaðarframleiðslu, sambært gr. 5, fylgiskjal II, frumskjal nr. 4, gr. 2.

Í samband við samráðingarnar at skipa nýtt landsstýri, var fundur við stjóran á Toll-

& Skattstovuni, og varð spurningurin um M.V.G. á landbúnaðarframleiðslu havdur á lofti. Har varð upplýst, at meginparturin av kjøtframleiðsluni slapp undan M.V.G., av tí at framleiðarin hevði minni enn kr. 20.000 í søluinntøkum, og tí ikki var M.V.G.-skyldugur.

Tað er tí avmarkað hvussu nógv M.V.G. av hesi vinnu gevur.

Áðrenn M.V.G. kuni í gildi varð lova bóndum, at teir skuldu fáa eina afturbering av M.V.G., fyri mjólk og seyðakjøt. Hesi lyftir vóru bert partvís innfríaðar, tí sum nú er fáa bøndur afturbering fyri ein part av mjólkini, meðan teir onki fáa fyri kjøti. Hetta hevði tað til fylgju, at skulu bóndir hava møguleika at sleppa av við sítt kjøt seinasta heyst, so mugu teir lækka prísirnar við 20%, t.v.s. at tað er ikki brúkarin sum skal gjalda M.V.G., men framleiðarin. Og tað er ikki í trá við grundsjónarmiði í M.V.G. lógini.

Tá handilssáttmálin eisini greitt leggur upp til, at vit kunnu hava eina serskipan á hesum øki, verður hetta uppskotið lagt fram, soleiðis at kjøt sleppur undan M.V.G., galdandi fyri slakti í heyst.

1. viðgerð 18. oktober 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 2. desember 1994 legði fram soljóðandi

álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 19. september 1994, og eftir 1. viðgerð 18. oktober 1994 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og hevur havt fund við Petur Alberg Lamhauge, stjóra á Toll-og Skattstovu Føroya, og Torbjørn Mikkelsen, fulltrúa.

Eisini hevur skattanevndin havt fund við Óla Jacobsen, landsstýrismann. Hann upplýsti, at landsstýrið var vitandi um ójavnan millum MVG-skrásettar kjøtframleiðarar og ikki MVG-skrásettar kjøtframleiðarar, og at landsstýrið skuldi fáa hetta rættað. Óli Jacobsen upplýsti, at landsstýrið heldur enn at gera undantak í MVG-lógini arbeiðir við endurgjaldsskipan til MVG-skrásettar seyðakjøtsframleiðarar. Hann segði, at so mikið var fráliðið, at endurgjaldið ikki kom í gildi fyrr enn fyri skurðin komandi ár.

Óli Jacobsen vissaði nevndina um, at MVG-endurgjaldið fyri seyðakjøt kom í gildi fyri skurðin komandi ár, og at 1 mió. kr. verður avsett á fíggjarlógaruppskot landsstýrisins fyri 1995.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen og Finnbogi

Ísakson) vísir til frágreiðingina hjá landsstýrismanninum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) vísir á, at løgtingið í MVG-lógini hevur samtykt, at kjøtframleiðarar ikki skuldu stillast verri fyri av MVG-lógini, og mælir tí til at samtykkja uppskot fólkafloksins.

Í øðrum lagi vísir minnilutin á, at MVG-skrásettir seyðakjøtsframleiðarar við MVG-lógini fóru úr 54,- kr./kg niður í 43,20 kr./kg og fóru í ár eftir fund við landsstýrið niður í 40,- kr./kg, meðan tann ikki MVG-skrásetti kjøtframleiðarin fær 50,- kr./kg.

Minnilutin vísir á, at bæði landsstýrið og meirilutin ásanna hetta órættvísi millum seyðakjøtsframleiðarar og vilja rætta hetta fyri skurðin í næsta ár, men ikki fyri skurðin í ár.

Skurðurin fyri í ár verður seldur frá 1. oktober í ár og langt út í næsta ár. MVG í ár er tí bert í síðsta ársfjórðingi og fellur ikki til gjaldingar fyrr enn 10 februar 1995, og tí er góð tíð til at gera endurgjaldsskipanina fyri skurðin í ár.

Einastu tøl, skattanevndin fekk upplýst undir viðgerðini fyri MVG á seyðakjøti, vórðu, at landsstýrismaðurin nevndi, at á fundi við Bóndafelagið varð eitt tal upp á uml. kr. 200.000,- árliga nevnt.

Um upphæddin er kr. 200,000 ella har á leið, er henda upphæddin eingin trupulleiki, tí nóg mikið av peningi er á konto nr. 17989 - 343133 á fíggjarlógini, sum løgtingið og landsstýrið kunnu áleggja Jarðarráðnum at nýta til endamálið.

Um uppskot fólkafloksins ikki verður samtykt, setir minnilutin fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum, at endurgjald til MVG-skrásettar seyðakjøtframleiðarar eisini verður galdandi fyri skurðin í 1994, og at peningurin verður tikin av konto nr. 17898 - 343133, konto til kjøt á fíggjarlógini.

2. viðgerð 5. desember 1994. Uppskot fólkafloksins fall við 7-0 atkvøðum. Uppskot minnilutans fall við 7-0 atkvøðum.

6 Kanning av politisku og umsitingarligu ábyrgdini í samband við skipabygging, veðhald og útgjalding av upphøggingarstuðli o.a.

Ár 1994, týsdagin 8. november legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til
samtyktar

Føroya løgting samtykkir beinanvegin at seta kanning í verk av politisku og umsitingarligu ábyrgdini í samband við skipabygging, veðhald og útgjalding av upphøggingarstuðli o.a. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingar og frágreiðingar í áliti í løgtingsmáli nr. 47-15/93: Grannskoðan av almennum roknskapum - Landskasssin.

Upphøggingarstuðul á síðu 9.
Serlán á síðu 9.
Lóg nr. 13/1967 um veðhald fyri prioritetslánum á síðu 12.
Veðhald-/veðhaldsútlegg fyri lánum til fiskiskip á síðu 13.
Veðhald fyri lánum til flakavirkir á síðu 18.
Veðhald fyri lánum til onnur virkir á síðu 18.
Veðhald fyri lánum til kommunur á síðu 19.
Veðhald fyri láni á síðu 19.
Veðhald fyri lánum á síðu 20.
Innkrevjing á síðu 21.
Ymsir grunnar á síðu 24.

Viðmerkingar:
Viðmerkingarnar á løgtingsmáli nr. 47-15/93: Grannskoðan av almennum roknskapum, dagf. 20. apríl 1994, vóru skelkandi lesnaður, og í fleiri føtum verður sagt frá, at umsitingarligu og politisku myndugleikarnir hava sýnt stórt ábyrgdarloysi, og at løgtingslógir og kunngerðir ikki hava verið hildnar.

Men hóast frágreiðingin skelkaði fjølmiðlaheimin og fólk flest, so varð kortini mælt til at samtykkja sjálvt uppskotið til samtyktar, sum snúði seg um roknskapir landskassans fyri fíggjarárini 1989-1991 við viðmerkingum, men uppskotið varð ongatíð samtykt á Føroya Løgtingi, tí ynski var um at beina málið aftur í nevnd undir 2. viðgerð.

Men í endanum á viðmerkingunum verður skrívað:

"Vísandi til álitið frá løgtingsgrannskoðarunum, grannskoðarafrágreiðingina fyri roknskapir landskassans 1989-1991 og onnur viðurskifti, landsstýrið í hesum sambandi er kunnað nærri um, verður álagt løgmanni at gera eina meting av, í

hvønn mun ein møgulig ábyrgd í ávísum málum eigur at staðfesta og á hvønn hátt, hetta kann gerast og kunna løgtingið um hetta."

Viðmerkingarnar í sínu heild koma við sera álvarsomum ákærum móti politisku og umsitingarligu myndugleikunum, sum bæði løgmaður og landsstýri eru beinleiðis partur av, og tí meta uppskotsstillararnir av hesum uppskoti, at henda niðurstøða í viðmerkingunum ikki lýkur treytirnar fyri objektivari kanning, og ber neyvan til løgfrøðiliga at áleggja somu umsiting at gera kanningina, sum sjálv er partur av umsitingarliga ruðuleikanum, sum løgtingsgrannskoðararnir vísa á í frágreiðingini og viðmerkingunum.

Tað er Føroya Løgting, sum sambært løgtingslóg um umboðsvald Føroya og løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum, hevur ábyrgdina av, at tær umsitingar, sum løgtingið setir á stovn gera tað arbeiðið, tær eru settar til.

Sambært viðmerkingunum frá løgtingsgrannskoðarunum hevur umsitingin ikki megnað hesa uppgávu, og tí má tað verða Føroya Løgting, óheft av øðrum umsitingarligum myndugleika, sum letur eina tílíka kanning gera, og er hetta orsøkin til hetta uppskot.

Frágreiðingarnar, ið komnar eru frá løgtingsgrannskoðarunum, bæði viðvíkjandi veðhaldum og útgjaldingum av upphøggingarstuðli benda á tað sama, sum avtøkustjórarnir á Skála Skipasmiðju kalla "politiskt og umsitingarligt ábyrgdarloysi".

Tá ið havt verður í huga, at ein av avtøkustjórunum er skrivstovustjóri í landsstýrinum, má tað haldast vera skylda hjá Føroya løgtingi beinanvegin at seta kanning í verk hesum viðvíkjandi.

Víst verður til løgtingsmálini um dómarakanning, sum Kristiligi Fólkaflokkurin (KrF) áður hevur lagt fram, løgtingsmál nr. 160/92 og nr. 12/1993.

1. viðgerð 24. november 1994. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt tann 8. november 1994 av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki, og varð aftaná fyrstu viðgerð tann 24. november 1994 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið.

Vísandi til, at Løgtingsmál nr. 37/1994 um kanning av møguligum óreglutigum politiskum og umsitingarligum avgerðum frá 1980 og framettir er til viðgerðar í løgtinginum, mælir **ein samd rættarnevnd** frá at samtykkja uppskotið. Víst verður í staðin til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 37/1994.

2. viðgerð 31. mai 1995. Málið afturtikið.

7 Ásetan av almannaveitingum

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

lagtingslóg um ásetan av almannaveitingum.

§ 1. Almannaveitingar sambært "Lov for Færøerne om folkepension", jb. lógarkunngerð nr. 103 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 227 frá 6. apríl 1994, "Lov for Færøerne om invalidepension m.v.", jb. lógarkunngerð nr. 101 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 227 frá 6. apríl 1994 og "Lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v.", jb. lógarkunngerð nr. 99 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 227 frá 6. apríl 1994, verða aftaná 1. januar 1994 óbroyttar tær somu sum í 1993.

§ 2. Upphæddin á fólka-, avlamis- og einkjupensjón v.m. og barnagjald er sum ásett í skjali 1.

§ 3. Lógin hevur gildi frá 1. januar 1994.

lagtingslov om fastsættelse af sociale ydelser.

§ 1. Sociale ydelser i henhold til lov for Færøerne om folkepension, jf. lovbekendtgørelse nr. 103 af 2. marts 1988, som senest ændret med lov nr. 227 af 6. april 1994, lov for Færøerne om invalidepension m.v., jf. lovbekendtgørelse nr. 101 af 2. marts 1988, som senest ændret med lov nr. 227 af 6. april 1994 og lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v., jf. lovbekendtgørelse nr. 99 af 2. marts 1988, som senest ændret med lov nr. 227 af 6. april 1995 forbliver efter 1. januar 1994 uændret de samme som i 1993.

§ 2. Størrelse af folke-, invalide- og enkepension m.m. og børnebidrag er som fastsat i bilag 1.

§ 3. Loven har virkning fra 1. januar 1994.

Viðmerkingar:

Í Danmark samtykti Fólkatingið í fjør ein skattareform. Ein avleiðing av hesum var, at m.a. almannaveitingar í Danmark frá 1. januar vóru javnaðar (reguleraðar) á einum øðrum grundarlagi enn áður.

Satsurin fyri 1994 er settur til minus 2,0%.

Í føroysku fólka- og avlamispensjónslógunum, umframt í lógini um barnagjald til stakar uppihaldarar, var fyrr ásett, at veitingar sambært lógunum skuldu verða javnaðar

samsvarandi tí, sum var galdandi í Danmark.

Fyri at forða fyri eini ikki tilætlaðari lækking av teimum sosialu veitingunum í Føroyum við 2,0%, vóru við fólkatingslóg nr. 227 frá 6. apríl 1994 gjørdar broytingar í lógunum (løgtingsmál nr. 50/1993), soleiðis at tað í § 36, 1. og 2. pkt. í fólkapensjónslógini, í § 43 í avlamispensjónslógini og § 23, stk. 1 í barnabidragslógini varð heimilað heimastýrinum at áseta reglur um, hvussu veitingar sambært lógunum við gildi frá 1. januar 1994 skulu javnast.

Ætlan landsstýrisins hevur ikki verið, at nevndu sosialu veitingar skuldu lækkast í 1994, og í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 1994 var upphæddin til hesar veitingar eisini ásett út frá, at veitingarnar vóru óbroyttar í 1994 í mun til 1993.

Fyriliggjandi lógaruppskot staðfestir hetta.

1. viðgerð 21. oktober 1994. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 10. november 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 18. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð tann 21. oktober beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 10.november 1994, og er nevndin samd um, at neyðugt er at seta tíðaravmarkandi reglu í § 3 í lógaruppskotinum, tí at ríkislóg nr. 227 frá 6. apríl 1994 "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser" tilskilar, at føroyskar almannaveitingar ikki framhaldandi skulu fylgja donskum reglum, men frá 1. januar 1994 "reguleres efter hjemmestyrets nærmere bestemmelser".

Tá landsstýrið ikki hevur ásett hesar reglur, mælir nevndin til, at ein tíðaravmarking verður sett í § 3 í fyriliggjandi lógaruppskoti, og at landsstýrið eigur at fyrireika slíkar endaligar reglur at fáa gildi frá 1. januar 1996.

Sostatt setir **ein samd nevnd** fram soljóðandi

I broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 3 verður orðað soleiðis: "Lógin hevur gildi frá 1. januar 1994 og fer úr gildi 31. december 1995."	§ 3 affattes således: "Loven har virkning fra 1. januar 1994 og træder ud af kraft 31. december 1995."

Tá prentvilla er í § 1 í danska tekstinum í fyriliggjandi lógaruppskoti, verður sett fram

Ii	**broytingaruppskot**
Eingin broyting.	I § 1 ændres "1995" til: "1994".

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum innan 1. apríl 1995 at leggja fyri tingið lógaruppskot við reglum um áseting av almannaveitingum, har heimilað verður landsstýrinum við kunngerð at áseta greiniligari reglur um fyrisitingina av hesi skipan.

2. viðgerð 11. november 1994. Uppskotið við broytingaruppskotunum frá samdari nevnd samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð 22. november 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

Lóg nr. 117 frá 2. desember 1994.

FL jnr. 1010-10/91.

8 Landsstýrismál

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði landsstýrið við skrivi málið fram.

31. mai 1995 legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi

álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. oktober 1994 og beint í landsstýrismálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt gerðabøkurnar hjá landsstýrinum fyri tíðarskeiðið 4. august 1993 - 28. juli 1994.

Ein samd nevnd mælir til, at løgtingið tekur gerðabøkurnar hjá landsstýrinum fyri nevndu tíðarskeið til eftirtektar og setir fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur gerðabøkurnar hjá landsstýrinum nevnda tíðarskeið til eftirtektar.

2. viðgerð 1. juni 1995. Málið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

9 Ígildissetan fyri Føroyar av kunngerðum viðvíkjandi norðurlanda samstarvinum

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at

1) kunngerð nr. 25 frá 24. mars 1994 um broyting í sáttmála millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svøríki frá 23. mars 1962 við seinni broytingum frá 13. februar 1971, 11. mars 1974, 15. juni 1983, 6. mai 1985 og 21. august 1991,
2) kunngerð nr. 61 frá 6. august 1986 um semju frá 15. juni 1983 um broyting í norrøna samstarvssáttmálanum frá 23. mars 1962,
3) kunngerð nr. 60 frá 6. august 1986 um semju frá 6. mai 1985 um broyting í norrøna samstarvssáttmálanum frá 23. mars 1962,
4) kunngerð nr. 1 frá 6. januar 1976 um semju frá 11. mars 1974 um broyting í samstarvssáttmála frá 23. mars 1962 millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svøríki og
5) kunngerð nr. 70 frá 20. juli 1971 um broyting í samstarvssáttmála frá 23. mars 1962 millum Danmark, Finland, Ísland, Noreg og Svøríki

verða lýstar at galda fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Í skrivi dagfest 18. august 1994 spyr ríkisumboðsmaðurin um heimastýrið kann taka undir við at omanfyri nevndu kunngerðir viðvíkjandi norðurlanda samstarvinum verða lýstar í Føroyum.

ad 1: Norðurlond eru samd um at broyta samstarvssáttmálan fyri at endurnýggja og menna samstarvið, nú norðurlond vaksa um samstarvið við Europa.

ad 2: Endamálið við broytingini er, at lata Føroyar og Áland fáa økta umboðan í Norðurlandaráðnum og Norrøna Ráðharraráðnum og at veita Grønlandi somu umboðan.

ad 3: Kunngerðin snýr seg um broytingar í bygnaðinum í sekretariatunum hjá Norðurlandaráðnum og Ráðharraráðnum.

ad 4: Broytingin ber í sær, at samstarvið verður víðkað til eisini at umfata umhvørvisvernd.

ad 5: Broytingin snýr seg um, at ráðharraráð verður sett á stovn, og at hetta fær myndugleika á øllum samstarvsøkjum.

4 tær seinastu kunngerðirnar eru galdandi fyri Føroyar og eingin av teimum hevur óynskt árin á føroyska luttøku í norrøna samstarvinum.

Málið verður við hesum lagt fyri Løgtingið við viðmæli um, at áður nevndu broytingar í Helsingforssáttmálanum verða lýstar at galda í Føroyum.

1. viðgerð 28. oktober 1994. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 8. november 1994. Uppskotið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

FL jnr. 30-1/91.

10 Broyting í arvagjaldinum

Ár 1994, mánadagin 5. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>løgtingslóg um broyting í lóg um arvaavgjald.</u>

<u>§ 1.</u>

Í lóg frá 27. mars 1908 um arvagjald, sum hon er sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan nr. 468 frá 8. november 1921 við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, A, verður orðað soleiðis:
   "Tá ið arvingarnir eru hjúnafelagi, eftirkomarar ella ætleiðingar: 10%".
2) § 2, B, verður orðað soleiðis:

<u>lagtingslov om ændring i lov om arveafgift.</u>

<u>§ 1.</u>

I lov af 27. marts 1908 om arveafgift, som denne er sat i kraft på Færøerne ved kgl. anordning nr. 468 af 8. november 1921 med senere ændringer, foretages følgende ændringer:

1) § 2, A, affattes således:
   "Når arven tilfalder arveladerens ægtefælle, afkom eller adoptivbørn: 10%."

"Tá ið arvingarnir eru foreldur ella eftirkomarar teirra, um so er at tey ikki koma undir litra A: 20%".

3) § 2, C, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru abbar ella ommur arvaleggjarans ella teirra eftirkomarar, um so er, at tey ikki koma undir litra A og litra B: 30%".

4) § 2, D, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru arvingar longur burtur í slektini ella arvurin fer til persónar, ið hann ikki er skyldur við: 40%".

5) Í § 2, seinasta stk., verður "Staten" broytt til: "landið" og "10 pct" broytt til: "40%".

6) § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Arvagjald verður bara goldið av arvapørtum uppá 3.000 kr. og hægri."

7) Í § 3, stk. 2 verður "200 kr." broytt til: "5.000 kr."

8) Í § 3, stk. 3 verður "500 kr." broytt til: "10.000 kr."

9) § 43 verður orðað soleiðis:
"Arvagjaldið fer í landskassan."

2) § 2, B, affattes således:
"Når arven tilfalder forældre eller personer henhørende til disses afkom, for såvidt de ikke falder ind under litra A: 20%."

3) § 2, C, affattes således:
"Når arven tilfalder arveladerens bedsteforældre eller personer henhørende til disses afkom, for såvidt de ikke falder ind under litra A eller litra B: 30%."

4) § 2, D, affattes således:
"Når arven tilfalder fjernere slægtninge af arveladeren eller personer, der ikke er beslægtet med ham: 40%."

5) I § 2, sidste stk. ændres "Staten" til: "landet" og "10%" til: "40%".

6) § 3, stk. 1 affattes således:
"Arveafgift svares kun af arvelodder på 3.000 kr. og højere."

7) I § 3, stk. 2 ændres "200 kr." til: "5.000 kr."

8) I § 3, stk. 3 ændres "500 kr." til: "10.000 kr."

9) § 43 affattes således:
"Arveafgiften tilfalder landskassen."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1995 og er galdandi fyri arvagjald, har gjaldsskyldian byrjar aftaná 31. desembar 1994.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1995 og finder anvendelse på afgiftspligt, der indtræder efter 31. december 1994.

Viðmerkingar:

Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995 er inntøkan á konto 3204: Arvagjøld, sett til 12 mió. kr.

Í fíggjarárinum 1993 var inntøkan 2,0 mió. kr. og í 1994 verður inntøkan metu til knappar 2 mió. kr. Galdandi reglur um arvagjøld eru lóg frá 27. mars 1908, sum hon er sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan nr. 468 frá 8. november 1921 við seinni broytingum. Prosentsatsirnir og krónuupphæddirnar, sum arvagjøldini verða roknað eftir, hava verið óbroytt, síðan lógin upprunaliga varð sett í gildi.

Í yvirlitinum niðanfyri verða vístverandi gjald og gjøldini, sum skotin verða upp:

Arvaflokkur:	Verandi gjald:	Uppskot:
A: Eftirkomarar	1 1/4% - 3%	10%
B: Foreldur og teirra eftirkomarar	4% - 6%	20%
C: Abbar, ommur og teirra eftirkomarar	7% - 9%	30%
D: Arvingar longur burtur í slekt o.o.	10% - 12%	40%
E: Stovnar, feløg o.t.	10%	40%.

Eftir broytingunum 6 - 8 verða minstuupphæddirnar, sum arvagjald verður roknað av, hækkaðar.

Eftir § 43 í lógini fer nakað minni enn helvtin av arvagjaldinum í statskassan og restin í landskassan. Eftir uppskotinum verður hetta broytt soleiðis, at alt arvagjaldið fer í landskassan. Broytingarnar eftir frammanfyri standandi uppskoti verða mettar at geva ta upphædd, ið sett er av á fíggjarlógaruppskotinum.

1. viðgerð 8. desember 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 21. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. desember 1994 og eftir 1. viðgerð beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 20. desembor 1994, og hevur talað við advokat við kunnleika til málsøkið og við Kára Petersen, fíggjarstjóra í Tinganesi.

Meirilutin (Sunc Jacobsen, Karl Robert Johansen, Vilhelm Johannesen og Finnbogi Ísakson) er av teirri áskoðan, at uppskot landsstýrisins um 10% fyri arvabólk A: Eftirkomarar, er ov høgt sett og metir at beinara talið er 5% og setur tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður "10%" broytt til "5%".	I § 1 ændres "10%" til "5%".

Nevndi meiriluti heldur, at landsstýrið skal taka stig til at endurskoða hesa lóggávu og setur fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at fyrireika nýggja arvagjaldslóggávu.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:
At hækka arvagjøldini metir minnilutin hava óbepnar avleiðingar við sær. At geva børnum gávur meðan ein livir er skattafrítt, men verður tað arvur, skal arvagjald rindast.

Úrslitið verður, at tey tlestu fara at geva gávur, meðan fyri tey, ið doyggja óvæntað, kanska í bestu árum, har verða arvingarnir straffaðir. Hetta kann koma illa við.

Minnilutin heldur, at vit verða ov hart skattaði meðan vit liva og mælir tí frá at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 2. januar 1995. Samtykt við 18 ∅ atkvøðum at beina málið aftur í skattanevndina. Burturdottið.

FL jnr. 2581-1/92.

11 Ígildissetan í Føroyum av lóg nr. 266 frá 22. mai 1986 um vaktarvirksemi

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi:

Løgtingið samtykkir at setast kann í gildi fyri Føroyar lóg nr. 266 frá 22. mai 1986 um vaktarvirksemi við hesum broytingum:

1) § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
   "**Stk. 2.** Kravet i § 1, stk. 1, om dansk indfødsret og bopæl her i landet bortfalder i det omfang, dette har hjemmel i international aftale, eller ved bestemmelser fastsat af justitsministeren efter forhandling med Færøernes landsstyre."
2) Í § 4, stk. 1 verður eftir orðini "fastsat af justitsministeren" skoytt uppí: "efter forhandling med Færøernes landsstyre."
3) Í § 5, stk. 1 verður 1. punktum orðað soleiðis:
   "En autorisation meddeles for bestemte former for vagtvirksomhed efter § 1, for et tidsrum på højst 5 år og for hele landet eller for nærmere fastlagde områder."
4) **§ 2 í lóg nr. 936 frá 27. desember 1992 um broyting í lógarreglum um vinnu við grundartagi í løggilding v.m.**
5) **§ 2 í lóg nr. 386 frá 20. mai 1992 um broyting í ávísum lógum innan øki løgmálaráðsins.**

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur við skrivi dagfest 4. mars 1993 frá ríkisumboðnum fingið fyrispurning um lóg um vaktarvirksemi við broytingum kann setast í gildi fyri Føroyar.

Málið hevur verið hjá landfútanum til ummælis, og mælir hann til, at lógin við onkrum tillagingum verður sett í gildi fyri Føroyar.

Í álíti frá 1985, ið liggur til grund fyri lógini í Danmark, verður mett, at ein ávísur tørvur er á at hava vaktarfyritøkur, og at hesar í royndi og veru virka fyribyrgjandi móti brotsverkum. Eisini verður mett, at samskifti millum løgregluna og vaktarfyritøkur hevur týdning fyri løgregluarbeiðið.

Sostatt hevur samfelagið ein áluga í tí virksemi, ið vaktarfeløgini hava, og var hetta høvuðssjónarmiðið fyri at gera regiur á økinum. Aftrat hesum kemur, at vaktarfeløgini reka eitt virksemi, ið soleiðis, sum tað er háttað, hevur eina serstøðu í mun til aðrar partar av vinnulívinum, tí uppgávurnar minna um ella kunnu mistakast fyri løgregluuppgávur. Ein lóggáva á økinum skuldi tí tryggja, at fyritøkurnar reka teirra virksemi á ein tryggjandi og fullgóðan hátt.

Eisini verður í álitinum mett, at borgararnir hava eitt rímiligt krav um vernd móti eftiransan og kannan, og í hesum sambandi kann nevnast, at fremjing av privatum vaktarvirksemi hevur við sær ein serstakan vanda fyri ólógligheitum, og eisini tí hevur í Danmark verið mett, at tørvur hevur verið á at fáa lóggávu á økinum.

Eftir lógini skulu vaktarfyritøkur m.a. hava serliga góðkenning ella løggilding, og er hetta eisini skipanin í Svørki og Finnlandi.

Í tilmæli sínum frá 19. oktober vísir landfútin til, at Føroya Brunatrygging hevur heitt á landfútan um at fáa lógina setta í gildi fyri Føroyar, tá tryggingin hevur ynskt at geva avsláttur til tryggingartakarar, ið eru knýtir at privatum vaktarfyritøkum. Landfútin hevur síðani vent sær til løgmálaráðið við spurninginum, og er spurningurin nú lagdur fyri heimastýrið til støðutakan.

Málið varð lagt fyri løgtingið tann 24. februar 1994 sum løgtingsmál nr. 127/1993, men var ikki liðugt avgreitt, tá valið varð útskrivað og er málið sostatt burturdottið.

Mælt verður løgtinginum til, at lógin við broytingum verður sett í gildi fyri Føroyar.

1. viðgerð 21. oktober 1994. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 17. februar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 18. oktober 1994 og aftaná fyrstu viðgerð tann 21. oktober 1994 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin havt fundir við umboð fyri Føroya Brunatrygging og umboð fyri Vaktargarðin v/Bjarna Thomsen.

Umboðið fyri Føroya Brunatrygging hevur greitt nevndini frá, at tað er eitt ynski frá kundunum at fáa avsláttur í tryggingargjaldinum, ið er orsøk til at Føroya Brunatrygging hevur heitt á landsstýrið um at gera eitt lógaruppskot um vaktarvirksemi. Føroya Brunatrygging gevur umleið 20% í avsláttri í tryggingargjaldinum hjá kundum, ið hava beinleiðis tilknýti til politistøðina ella brandstøðina. Harafturímóti veitir Føroya Brunatrygging ikki avsláttur til teir kundar, ið hava tilknýti til Vaktargarðin, av tí at Vaktargarðurin ikki er góðkendur. Fyri at fáa avsláttur er tað ein treyt, at kundin hevur vakt 24 tímar um døgnið.

Føroya Brunatrygging heldur tað ikki vera neyðugt at seta donsku lógina í gildi í Føroyum. Tað, ið er avgerandi fyri Føroya Brunatrygging, er, at nøkur av krøvunum, ið eru nevnd í donsku lógini, verða sett í gildi í Føroyum, t.d. at viðkomandi vaktarmaður ikki er revsaður, og at kundin hevur vakt 24 tímar um døgnið.

Umboð fyri Vaktargarðin hava fört fram fyri nevndini, at tey ikki duga at síggja nakra orsøk til at seta donsku lógina um vaktarvirksemi í gildi í Føroyum. Lógin er gjørd til donsk viðurskifti. Orsøkin til, at lógin varð gjørd í Danmark er, at nógvir persónar byrjaðu at reka vaktarvirksemi. Í flestum førum kendu myndugleikarnir ikki hesar persónar, og tí varð hildið neyðugt at gera nakrar reglur á økinum, soleiðis at ikki ein og hvør skal kunna virka í sovorðnum starvi. Hetta er ikki neyðugt í Føroyum, tí her kenna øll hvønn annan. Eingin í Føroyum fer at biðja ein persón halda vakt, um hesin

hevur gjørt nakað, ið ikki kann foreinast við starvið sum vaktarmaður.

Umboðini fyri Vaktargarðin halda, at um lógin skal setast í gildi í Føroyum, eigur hetta at gerast í broyttum líki. Í hesum sambandi hava umboðini sent rættarnevndini eitt lógaruppskot, ið eisini er grundað á donsku lógina, men við munandi færri avmarkingum enn danska lógin og uppskot landsstýrisins.

Umboðini fyri Vaktargarðin hava greitt nevndini frá, at tað teimum kunnugt bert eru tvey virki, ið reka hesa vinnu her á landi.

Ein samd rættarnevnd heldur ikki, at tað er rætt at seta donsku lógina um vaktarvirksemi í gildi í Føroyum í óbroyttum líki.

Hinvegin heldur nevndin, at tað skal skal verða møguligt hjá viðskiftafólki hjá Føroya Brunatrygging, ið samstundis eru knýttir at einum vaktarvirki, at fáa avsláttur í tryggingargjaldinum, um tey lúka ávís krøv, ið Føroya Brunatrygging setur.

Vaktarvirksemi kemur undir kap. 24 í danska lógaryvirlitinum, ið fevnir um politimál. Av tí at talan er um eitt felagsmál sambært heimastýrislógini, kann løgtingið bert mæla ríkisstjórnini til at seta lógina í gildi í Føroyum við (tekniskum) broytingum orsakað av føroyskum viðurskiftum. Løgtingið kann ikki broyta sjálvt innihaldið í lógini. Hetta má Fólkatingið gera.

Av tí at málið kemur undir felagsmál, kann løgtingið ikki við vanligari løgtingslóg áseta reglur á økinum.

Rættarnevndin heldur ikki, at málið hevur slíkan týdning, at orsøk er til at biðja Fólkatingið um at viðtaka eina serliga lóg fyri Føroyar um vaktarvirksemi, ella at seta partar av donsku lógini í gildi í Føroyum.

Skulu serligar reglur um vaktarvirksemi í Føroyum gerast, eigur landsstýrið at gera hetta í samráð við ríkismyndugleikarnar, og setur nevndin tí fram soljóðandi

u p p s k o t

til
samtyktar

Landsstýrið verður biðið um at kanna um serligar reglur skulu gerast fyri vaktarvirksemi í Føroyum, og um so er, at gera hetta í samráð við ríkisstjórnina.

2. viðgerð 9. mars 1995. Uppskot landsstýrisins fall við 2-0 atkvøðum. Uppskotið frá rættarnevndini varð samtykt við 30-0 atkvøðum.

FL jnr. 682-1/93.

12 Ígildissetan fyri Føroyar av lóg um Tann Europeiska Mannarættindasáttmálan

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 285 frá 29. apríl 1992 um Tann Europeiska Mannarættindasáttmálan kann setast í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:
Landsstýrið hevur við skrivi dagfest 7. mars 1994 fingið fyrispurning frá ríkisumboðnum, um heimastýrið ynskir, at lóg nr. 285 frá 29. apríl 1992 um tann Europeiska Mannarættindasáttmálan verður lýst at galda í Føroyum.

Við lógini verður mannarættindasáttmálin inkorporeraður í føroyskan rætt.

Ein inkorporering fer at føra við sær, at galdandi rættarstøða, har dómstólarnir nýta reglurnar í mannarættindasáttmála í samband við tulking av galdandi rætti, verður lógarfest.

Sáttmálin við uppískoytisprotokollum er galdandi fyri Føroyar, tó soleiðis, at uppískoytisprotokoll nr. 7, sum løgtingið hevur samtykt, kann setast í gildi fyri Føroyar, enn ikki er lýst.

Mælt verður løgtinginum til at samtykkja, at setast kann í gildi lóg um tann Europeiska Mannarættindasáttmálan.

1. viðgerð 21. oktober 1994. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 21. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð 21. oktober 1994 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir einmælt til at samtykkja, at setast kann í gildi lóg um Tann Europeiska Mannarættindasáttmálan.

2. viðgerð 2. januar 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

FL jnr. 65-1/90.

13 Aktivering av avsettum peningi móti tapum í sethúsaskuldini

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya løgting áleggur landsstýrinum í stundini at taka samband við almenna bankan við kravi um, at skundað verður undir eina aktivering av avsetta peninginum móti tapi í sethúsaskuldini, og at peningurin verður brúktur at skuldaravskriva sethúsalán.

Viðmerkingar:

Farna árið eru umstøðurnar at lívbjarga sær her á landi versnaðar munandi.

Sertiga aftaná ógvusligu hækkingina av kommunuskattaprosentunum, gjørdist støðan hjá løntakarunum ótolandi.

Serliga ring er støðan hjá teimum, sum farnu 10 árini hava sett føtur undir egið borð.

Við avtaluni millum donsku stjórnina og landsstýrið í okt. 93, fekk bankin tilførdan kapital, svarandi til niðurskrivingina av sethúsavirðunum.

Hóast tað kom flestu sera dátt við, tá Fíggjareftirlitið í einum strikaði virðið á sethúsognunum við eini helvt, kveikti tað sjálvsagt ta vón millum ánararnar, at nú vildu lánistovnarnir selja ella sanerað partar av prioritetunum, men so varð ikki. Í staðin skuldu borgarar landsins, umframt at gjalda ta rokning, sum landsstýrið skrivaði út at "bjarga" bankaskipanini, eisini gjalda tey lán, sum bankin avskrivaði og fekk afturgoldin frá skattgjaldarunum.

Tískil var útspælið nýggjársaftan frá lánistovnunum lítisvert. Har var ikki talan um hjálp, tí hvat hjálptu nakrar hundrað krónur um mánaðin í útreiðslulætta, tá tørvur er á túsundum.
Bert uml. 20% av útlánum bankans vóru tá til sethúsamassan, so eyðsýnt er, at bankin við eini lækkan av allari innlánsrentuni við einum prosenti um ársskiftið, veruliga fekk pláss fyri eini rentulækkan av sethúsalánunum, ið var útvið fimm prosent.
Annað er, at allar milliardirnar, sum bankin fekk tillutaðar frá borgarunum, eru latnar

bankanum rentufríar. Sostatt kann bankin njóta fullan rentuvinning av hvørjari krónu, sum er plaserað uttanlands.

Versnandi fíggjarstøðan manna millum minkar alsamt um gjaldsevnini og hevur við sær vantandi gjaldsvilja. Í kjalavørrinum breiðir seg ein hóttandi lívkasæla. Hesin veruleiki sýnist tó hvørki at nerva bankaleiðslur ella myndugleikar.

Men tað er kanska heldur ikki so løgið, tá tað sýnist eyðsýnt, at hesar leiðslur fyrst av øllum skulu tryggja útlendskt peningavald.

Og uppskriftina til hesa loysn kenna vit øll - føroyingurin skal gjalda mest mnøguliga skuld í stytst møguliga tíð.

Úrslitið av hesi atgerð er, at fjøld av fólki rýmir av landinum. Tað er eisini hugstoytt hjá vanliga lønmóttakarunum at kenna, at bjargingarlínan, hann veitti bankanum, nú er smoygd um kvørkrarnar á honum.

Niðurskrivingin av sethúsavirðunum og avgerðin um einvegis at veita bankunum missin í trygdini, setti eisini Húsalánsgrunnin í eina sera óhepna støðu, tí reelt er ongin trygd aftanvert útlán grunsins.

Hetta hevur sett grunnin í eina veika støðu mótvegis hinum lánistovnunum, tá ræður um at finna loysnir fyri hin einstaka sethúsaskuldaran.

Um miðan okt. 93 var eitt notat frá ríkisgóðkendum grannskoðara almannakunngjørt, har víst varð á, hvussu kapitalflytingin til bankarnar kundi kanaliserast í Húsalánsgrunnin. Harvið spurdust møguleikar at foreinkla lánitrupulleikarnar á sethúsamarknaðinum. Harumframt var gjørligt skjótt at finna júst tað røttu gjaldsloysnina fyri hin einstaka sethúsaeigaran.

Henda loysnin var ikki fylgd, og Húsalánsgrunnurin varð sleptur á fjall.

Tí er stórur vandi fyri, at grunnurin sum frálíður kemur í eina púrasta ókontrollerða støðu, har hann í einum endar í landskassanum.

Hóast milliardir eru fluttar til samfelagið seinastu tvey árini, er onki av hesi øgiligu upphædd endað í umfari í samfelagnum, tvørturímóti.

Økingin í skatta- og avagjaldstrýstinum, saman við vantandi forstáilsi frá peningastovnunum, hevur havt við sær, at borgarar landsins nú als ikki síggja fyri endan á kreppustøðuni.

Støðan er so út av lagi, at húsarhald í høvuðsstaðnum (tvey vaksin og tvey børn), sum hevur eitt samlað lán áljóðandi kr. 800.000, og sum ger øll lánini um til 30 ára annuitetslán, og sum bert hevur tær føstu útreiðslur annars, sum lánistovnarnir loyva, skal, um bert ein inntøka er í húsinum, forvinna kr. 27.100 pr. mðr., t.e. omanvert

40% pr. ár av samlaðu skuldini!

Og er lánsupphæddin kr. 1.000.000, skulu ikki minni enn kr. 30.500 í húsið um mðr.!

Hetta er púra høpisleyst, tí bert tey allarfægstu koma í námind av hesi upphædd, hava tey bert eina inntøku at liva av. Støðan er eitt sindur frægari eru tað tvey, sum hava inntøku í húsarhaldinum.

Tá tað hinvegin gerst alt greiðari, at tað framyvir ikki verður arbeiði til allar hendur, er tað eyðsýnt, at nógvu húsarhaldini verða noydd at liva av einari mánaðarligari inntøku.

Tí eru lánistovnarnir nú í nógvum førum noyddir at niðurfrysta stórar partar av lániupphæddir hjá einstaklingunum skal nakar samanhangur vera í mánaðarligu rakstrarútreiðslum hjá húsarhaldunum einsæris.

Sostatt verður neyvt eftirlit við nýtsluni hjá tí einstaka og fíggjarliga rásarúmið tilsvarandi avmarkað.

Umframt 30-ára annuiteislán, har bert rentur verða goldnar týrstu nógvu árini, fara niðurfrystu lánini at hótta í viðførinum, tí skuldi lántakarin fingið batnandi fíggjarligt grundarlag, verða frystu lánini tiðnaði so hvørt.

Sostatt fara hesir lántakarar at liva á einum eksistensminimum í óavmarkaða tíð til óbótaligan skaða fyri peningaumfarið í fríu vinnuni og harvið allan framburð í landinum.

Tá sambandið millum fíggjarorkuna hjá einstaklinginum og møguleikarnar hjá privatu vinnuni at halda uppi neyðuga peningarenslinum er so sjálvsagt, er tað undrunarvert, hvussu lítlan prioritet hesin veruleiki hevur millum teir ráðandi og í bankanum.

Úrslitið er eisini, at milliardalikviditetur bankans nu er bundin at standa móti vantandi tapi.

Soliditetur bankans er eisini so knappur, at eingki rásarúm er til fígging av nýggjum fyritøkum.

Samfelagið er endað í eini óndari ringrás.

Skal tí ikki seinasta sindrið av framtíðarvónini verða tikið frá borgarum landsins, er neyðugt í stundini at gera okkurt munagott at lætta um byrðarnar.

Umfrannt at endaverða skattaskipanini við tí fyri eyga at seta í verk eina bruttoskattaskipan, eigur øll MVG-skipanin at verða endurskoðað.

Harumframt átti bankin eisini at kent sína vitjunartíð. Men tá hann higartil hevur

sloppið sær undan hesi ábyrgd, er onki annað hjá løgtingingum at gera, enn sum frægast at ávirka har tingið framvegis hevur møguleika.

Tí eigur Føroya Løgting at áleggja landsstýrinum at taka samband við almenna bankan við kravi um, at skundað verður undir eina aktivering av avsetta peninginum móti tapi í sethúsaskuldini, og at peningurin verður brúktur at skuldaravskriva/selja sethúsalán.

Henda hjálp eigur sjálvsagt eisini at koma teimum til góða, sum við sparsemi sjálv megnaðu at fíggja munandi part av íløguni í bústað, men sum nú svíða fyri, at lánskuldin ikki er ein hóttan hjá Bankaeftirlitinum.

Tí eiga myndugleikarnir at virka fyri, at møgulig aktivering av teirri upphædd, sum er avsett móti tapi í bankanum, verður spjædd yvir fleiri veðrættir.

Tiltøk eiga eisini at verða framd, sum geva Húsalánsgrunninum somu sømdir at virka undir, sum bankarnir treytaleyst hava fingið.

Skal hesin grunnur framettir virka undir skipaðum viðurskiftum, er neyðugt, at Føroya Løgting ásannar, at við verandi gongd verður Húsalánsgrunnurin ikki førur at svara sínum skyldum mótvegis kreditorum sínum. Tí eigur landsstýrið at fáa heimild at yvirtaka lán grunsins, so hvørt tey falla til gjaldingar.

Verður hetta ikki gjørt, enda vit í enn eini panikkloysn, har tilvíðin aftur ræður.

Verður Húsalánsgrunnurin harafturímóti loystur frá hesum hóttafalli, gevur tað honum møguleikar at viðgera sethúsalánini á heilt øðrum støði, nevniliga í gjaldsmøguleikunum hjá einstaka lántakaranum.

Hetta er tí sjálvsagt ein spurningur, sum landsstýrið eigur at reisa og fáa avgreiddan á fundinum komandi við donsku stjórnina.

Í samsvari við veruleikan, verður tí sett fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum at veita Húsalánsgrunninum neyðugan kapital at selja/sanera sethúsalán.

1. viðgerð 27. oktober 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 10. november 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum tann 18. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð tann 27. oktober 1994 beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havi fund við Klaus Rasmussen frá Grannskoðarafelagnum Rasmussen og Weihe.

Grundarlagið fyri fundinum var notat dagfest 21. oktober 1993 um hvussu felagið helt, at bøtast kundi um kreppuna hjá húsaeigarunum.

Tá landsstýrið seinast veitti Føroya Banka pening, skeyt Grannskoðarafelagið upp, at peningur í staðin varð latin Húsalánsgrunninum. Hugskotið var, at Húsalánsgrunnurin skuldi keypa tann partin av sethúsaskuldini, sum fíggjareftirlitið kravdi, at bankin skuldi seta av.

Víst var á, at handilstreytaða grundstøðið hjá bankanum gjørdi, at Húsalánsgrunnurin hevði betri møguleikar enn bankin at fremja generellar loysnir fyri sethúsamarknaðin.

Sum dømi um loysn varð nevnt ein lág renta av skuld upp til eitt ávíst loft og so niðurfrysting av skuldini, sum var omanfyri loftið. Tann niðurfrysti parturin av láninum skuldi ikki forrentast av avdragast í t.d. eitt 10-ára skeið, men tá tíðin var farin, skuldi niðurfrysti parturin forrentast og avdragast á vanligan hátt.

Grannskoðarin svaraði spurningum og metti um gongdina á sethúsaøkinum, síðani notatið varð skrivað. Hann helt, at tíðin var farin frá tí loysnini, sum tá varð skotin upp.

Fíggjarnevndin hevur eisini havt fund við Janus Petersen, stjóra í Føroya Banka.

Janus Petersen greiddi frá, hvussu bankin arbeiddi við eftirstødum í sethúsalánum. Bankin hevur gjørt rættiliga nógvar individuellar avtalur fyri at bøta um gjaldførið hjá kundunum, sum eru kommir illa fyri.

Talan kann t.d. vera um longda afturgjaldsfreist, rentulillaging og niðurfrysting av einum parti av skuldini.

Bankastjórin nevndi, at tey flestu starvsfólkini í útlánsdeildini arbeiddu við sethúsamálum. Bankasamanleggingin hevði darvið avgreiðslunum eitt sindur, men hann metti, at gjørdu avtalurnar nú høvdu tikið broddin av tvingilssølunum.

Janus Petersen nevndi, at Føroya banki fór at taka væl ímóti einum møguligum politiskum útspæli, men duldi tó ikki fyri, at bankin helt, at ein aktivering av avsetta peninginum ikki var so góð loysn, sum t.d. ein víðkaður rentufrádráttur ella tilskotsskipan av einum hvørjum slag.

Ein samd fíggjarnevnd heldur, at ein aktivering eigur at kannast, og setir tí fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Føroya løgting heitir á landsstýrið at kanna, hvussu peningur, sum Føroya Banki hevur avsett móti tapi í sethúsaskuld, kann aktiverast fyri at lætta um fíggjarstøðuna hjá sethúsaeigarum. Úrslitið av kanningini skal leggjast fyri løgtingið áðrenn 1. mars 1995.

Anfinn Kallsberg hevur hesar viðmerkingar: Undir viðgerðini av málinum, er nevndin samd um, at neyðugt er at fáa gjørt nakað við hetta álvarsmál.

Tá møguleiki sær út til at verða fyri at fáa eitt sam løgting at atkvøða fyri málinum, um Fólkaflokkurin er við at orða uppskotið eitt sindur øðrvísi, mælir Anfinn Kallsberg til at taka undir við uppskotinum frá einari samdari nevnd í staðin fyri uppskot Fólkafloksins.

2. viðgerð 22. november 1994. Uppskotið frá samdari fíggjarnevnd samtykt við 25-0 atkvøðum, tá fólkaflokkurin tók sítt uppskot aftur.

14 Val av álitismonnum og nevndum

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði løgtingsformaðurin Marita Petersen fram málið um val av álitismonnum og nevndum.

21. oktober 1994 varð málið tikið av skránni.

1. juni 1995 vórðu hesi vald:

2 eftirlitsmenn til fongslini
1. María Hansen, Vestmanna,
2. Børge B. Hansen, Ægishædd 7, Tórshavn.

Lokalnevnd viðv. virksemi løgreglunnar:
1. Vilhelm Johannesen,
2. Anfinn Kallsberg,
3. Lisbeth L. Petersen,
4. Jógvan Durhuus.

Nevningagrundlistar:
Suðuroyar sýsla:
1. Tórleivur Augustinussen, Vági,
2. Sanna Mortensen, Tvøroyri,
3. Palli Jacobsen, Vági,
4. Hjalmar Thomsen, Sumba,
5. Hervør Svalbard, Trongisvági.

Sandoyar sýsla:
1. Palle Dalsgaard, Skálavík,
2. Herman Winther, Skopun,
3. Hansa Olsen, Húsavík,
4. Anna Horn, Sandi.

Streymoyar sýsla:
1. Gisleyg Dahl Bonde, Tórshavn,
2. Óli Jákup Gaard Olsen, Vestmanna,
3. Tórstein Grækarisson, Kvívík,
4. Inger á Argjagarði, Argir,
5. Arne Juul Arnskov, Tórshavn.

Vága sýsla:
1. Karlo Joensen, Miðvágur,
2. Tordis Skálum, Sørvágur,
3. Helgi Mouritsen, Sørvágur,
4. Hans Arni Nielsen, Sandavágur.

Eysturoyar sýsla:
1. Eilif Debes, Oyri,
2. Anna Berg, Skáli,
3. Julia Johannesen, Skáli,
4. Hans Martin Jacobsen, Fuglafirði,
5. Helena Eliassen, Toftir.

Norðoya sýsla:
1. Gerda Absalonsen, Klaksvík,
2. Hanna Adam, Klaksvík,
3. Andrea Løwe Jacobsen, Klaksvík,
4. Jógvan Vágsheyg, Klaksvík,
5. Sámal Christiansen, Klaksvík.

Nevndarlimur í Tryggingarsambandið Føroyar:
Jógvan Lützen, Klaksvík.

15 Kanningar av marknaðarviðurskiftum Føroya mótvegis ES

Ár 1994, frígjadagin 21. oktober legði Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar.

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum skjótast at skipa fyri kanningum at bøta marknaðargongdina á Europeiska marknaðinum.

Viðmerkingar:
Farnu mánaðirnar hevur nógv orðaskifti verið um týdningin av at lækka kostnaðarstøðið, skal landið reisa seg aftur búskaparliga.

Hollasti máti at koma undan hesum hóttafalli er at lækka skattatrýstið fyri soleiðis at leggja lunnar undir lækkan av kostnaðarstøðinum, so fólk aftur kunnu koma í arbeiði. Semja var í summar um at seta í verk eina reallønarhækking, sum skuldi hava við sær lækking av kostnaðarstøðinum, men sum øllum kunnugt, er henda ætlan nú slept. Onki røkist fyri, at meiriluti nú er í løgtinginum fyri at fremja hetta alneyðuga tiltak. Heldur ikki tykist nakað líkinda alternativ at vera í ljósmála.

Annar táttur at bøta um okkara kapingarføri, er betri marknaðaratgongd á Europeiska meginlandinum.

Nýggj marknaðaravtala við ES, sum hevði tryggjað okkum fría atgongd til ES-marknaðin við øllum vørum framleiddum í Føroyum, hevði givið nógv nýggj arbeiðspláss og hevði umvegis skapt rúmd í almennu kassunum fyri at lækka kostnaðarstøðið.

Nýggj marknaðaravtala við ES (frí atgongd) hevði, sambært bólki av serfrøðingum í føroyskum vinnulívi, havt fylgjandi úrslit fyri hesar vinnugreinar:

Vinnugrein	Nýggj arb. pláss	Tíðarskeið, ár
Flakaframleiðsla	996	0-3
Fiskiídnaður	240	0-3
Tilsamans	1.236	
Avleidd arbeiðspláss	494	
Falt	1.730	

Sum sæst, gevur frí atgongd á ES-marknaðin grundarlag at betra okkara útlutningsmøguleikar og leggur harvið støði undir øktum aktiviteti í landinum.

Kostnaðurin fyri almennu kassarnar av fríu atgongdini er neyvan stórur. Hinvegin gevur hetta økta virksemið stóran vøkstur í skattagrundalagnum.

Í politiska kjakinum um ES verða sum oftast bert tær negativu síðurnar við hesi samgongu umrøddar. Hesi sjónarmið darva orðaskiftinum um teir møguleikar, hesin felagsskapur kanska kann bjóða.

Tað er ein royndur lutur, at ES er har, um vit vilja tað ella ei. Tí mugu vit at siggja hesa samgongu sum ein møguleika heldur enn eina hótta.

Føroya Løgting eigur tí at taka upp samráðingar við ES um eina handilsskipan uttan forðingar, tó so at vit tryggja okkum avgerðarrættin á fiskiveiði og møguligum oljurikidømi við Føroyar.

Eitt nú kunnu avtalurnar sum heimastýrdur oyggjarsamfeløgini í Bretlandi hava við ES, verða rannsakaðar og nýttar sum fyrimynd hjá Føroyum.

Ásannandi at Føroyar standa uttanfyri ES, eiga tí allir fyrimunir og vansar fyri samvinnu at verða kannaðir.

Í samsvar við veruleikan verður tí uppskot um hetta álvarsmál sett fram til samtyktar.

1. viðgerð 28. oktober 1994. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 18. apríl 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 21. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð 28. oktober 1994 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Helena Dam á Neystabø, Jógvan A. Johannessen, Jógvan I. Olsen og Ingeborg Vinther), ið eisini myndar músitandi samgongu, leggur stóran dent á, at marknaðarviðurskifti Føroya mótvegis ES verða munandi betri enn tey eru í dag. At so er, ber eisini samgonguskjalið prógv um, har tað fleiri ferðir verður sagt, at bøtast skal um marknaðaratgongd Føroya á ES marknaðinum, og at gagnligasta handilsavtala skal fáast í lag. Til tess krevjast samráðingar, sum tað er uppgáva landsstýrisins at fyriskipa. Marknaðarnevndin vendi sær til landsstýrið við fyrispurningi um, á hvønn hátt landsstýrið leggur hetta arbeiði til rættis, og er avtala fingin í lag við landsstýrið um, at marknaðarnevndin regluliga verður kunnað um tey stig, ið verða tikin. Henda avtalan hevur virkað á tann hátt, at fundur hevur verið millum landsstýrið og marknaðarnevndina eins og skrivligar kunningar eru sendar marknaðarnevndini regluliga.

Eisini heitti marknaðarnevndin á landsstýrið skjótast møguligt at fáa framt framstig í arbeiði felagsnevndarinnar, soleiðis at álvarsamar tollforðingar kundu verða burturbeindar, og sum kunnugt er kvotan uppá 2000 tons av viðgjørdum vørum nú tikin burtur, og kunnu tær viðgjørdu vørurnar (t.m. í høvuðsheitum tær raspaðu vørurnar úr føroyskum fiski) nú flytast inn á ES marknaðin í óavmarkaðum nøgdum. Eisini er nevnd sett at kanna framtíðar handilssamband Føroya við ES.

Enn er ikki rokkið á mál, men meirilutin í marknaðarnevndini vísir í hesum máli til ta avtalu, sum er gjørd flokkana millum í samgonguskjalinum um, hvussu farast skal fram í royndini at bøta um marknaðarviðurskifti Føroya mótvegis ES, og tekur tí ikki undir við málinum.

Fólkaflokkurin gitir í minnilutaáliti sínum, at tvídráttur er í samgonguni um hetta mál. Tað er við ES spurninginum, sum við flestum politiskum spurningum, at flokkar eru ymiskir á máli, hvør besta og rettasta loysnin er, soleiðis sjálvsagt eisini við ES-

spurninginum. Men uttan mun til, hvørja áskoðan flokkarnir hava til spurningin um føroyskt tilknýti til ES, so er breið semja um, at verandi handilsavtala við ES nøktar ikki tørvin, og eigur øll orka at verða løgd í at betra hana.

Ein minniluti (Bjarni Djurholm) hevur hesar viðmerkingar:

Nú skjótt hálvt ár er runnið, síðan uppskot fólkafloksins um kanningar av marknaðarviðurskiftum Føroya mótvegis ES varð lagt fyri løgtingið, hevur hetta uppskot, helst orsakað av tvídrátti í samgonguni um hetta mál, ikki fingið nakra ítøkiliga viðgerð í marknaðarnevndini.

Hóast tað er neyðugt at ásanna, at sínámillum avtalan við ES ikki er nýtilig, nú m.a. føroysk rávøra trýtur í ólukkumát, so hevur meirilutin í marknaðarnevndini ikki sýnt áhuga fyri at kanna og lýsa ymiskar møguleikar fyri handilssamskifti við ES.

Marknaðarnevndin hevur fingið útflýggjað tilfar um ymiskar alternativar handilsskipanir, men hevur hetta ikki vakt nakran ans og er enn minni viðgjørt.

Vantandi nevndarviðgerðin ger, at løgtingið ikki fær haldgott grundarlag at taka støðu á. Tað er greitt, at vilan undir øllum umstøðum er ein fortreyt, tá støða skal takast til eitt mál.

Fyri at bøta um, verður kap. VI - **Viðurskiftini við ES** úr "Frágreiðing um bygnaðartrupulleikar í føroyska búskapinum", skrivað av Endurreisingarnevnd landsstýrisins", løgd fyri løgtingið til kunningar.

Hóast avmarkaðar í vavi, umframt at nakrar av fortreytunum eru broyttar, síðani nevndin tíðliga í 1994 almannakunngjørdi frágreiðingina, so geva upplýsingarnar innlit í ymisk møgulig alternativ fyri skilagóðari marknaðaratgongd.

Ásannandi, at Føroyar verða uttan fyri ES, áttu allir fyrimunir og vansar fyri samvinnu við henda felagsskap at verið lýstir til fulnar. Tí mælir minnilutin (Bjarni Djurholm) til at samtykkja uppskotið, sum tað fyriliggur.

Ein annar minniluti (Jógvan Durhuus) førir fram: Vísandi til viðmerkingarnar í uppskotinum hjá fólkaflokkinum um kanningar at bøta um marknaðaratgongdina á Europeiska marknaðinum, so verður sipað til, at semja var undir landsstýrissamráðingunum um at seta í verk reallønarlækking, sum skuldi hava við sær lækking av kostnaðarstøðinum - sum fór aftur við borðinum, tá fólkaklokkurin ikki slapp í samgongu og framhaldandi viðmerkingar um, at Føroya løgting eigur at taka upp samráðingar við E.S., "um eina handilsskipan uttan forðingar, tó so at vit tryggja okkum avgerðarrættin á fiskiveiði og møguligum oljurikidømi við Føroyar", so ljóðar hetta alt sera gott.

Undir 1. viðgerð av hesum uppskoti, vóru menn ymiskir á máli um endamálið við hesum uppskoti, tá hugsað verður um fortíð/leiklut fólkafloksins í samband við seinast gjørda sáttmála við E.S., hvar fólkaflokkurin, saman við javnaðarflokkinum, glaðbeintir

buðu E.S. at seta eina meirvirðisgjaldsskipan í verk, hóast hetta als ikki var nakað krav/treyt frá E.S. í samband við sáttmálan. Tá vit í dag síggja hvussu henda skaðiliga/kostnaðardýrkandi MVG-skipan hevur tikið beinini undan ídnaði, handverksvinnu og tí bygdamenning, sum hóast alt var komin upp at standa og samstundis tekur allan virkishug undan hugsandi nývinnum, so er kanska vón fyri, at uppskotsstillarin og aðrir (flokkar) viðganga mistakið og taka undir við sjónarmiðum tjóðveldisfloksins, sum eru soljóðandi:

"Frá 1. januar 1993 vórðu innflutningsgjøldini sett úr gildi, og í staðin varð ein skipan við meirvirðisgjaldi sett í verk. Meirvirðisgjaldið umfatar ikki bara innfluttar vørur, men flestallar tænastur eisini, og ger tí grundarlagið fyri óbeinleiðis skatti breiðari.

Tjóðveldisflokkurin heldur ikki, at skipanin við meirvirðisgjaldi hóskar til føroyska samfelagið. Tann almenna og privata umsitingin gerst ov stór, og tórført verður hjá landskassanum at fáa peningin inn. Skipanin má haldast at fáa ta avleiðing, at nógvar smærri fyritøkur halda uppat, tí tær ikki eru førar fyri at umsita skipanina, ella at landskassans útistandandi gerst ómetaliga stórt.

Tí eigur at verða roynt at venda aftur til skipanina við innflutningsgjøldum og um neyðugt skatta summar tænastur eisini. Tjóðveldisflokkurin heldur, at hetta lýkur EF-kravið um, at føroyskar vørur og innfluttar vørur skulu javnsetast í gjøldum."

Tí setir minnilutin (Jógvan Durhuus) fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at fyrireika nýggjar samráðingar við E.S., sum geva okkum betri útflutnings/handilssømdir og sum loysa okkum úr meirvirðisgjaldsskipanini mótvegis E.S.

Hin triði minnilutin (Jenis av Rana) førir fram:
Støða miðfloksins til ES er avgjørd - tann ódemokratiska skipanin, sum er grundarlagið undir hesum felagsskapi, liggur so fjart frá tí, vit meta vera rætt, og sum vit ynskja fólki okkara.

Uppskot fólkafloksins snýr seg um framtíðarviðurskifti okkara við hendan felagsskapin.

Var uppskotið og serliga viðmerkingarnar meiri nágreiniliga orðað høvdu vit kent okkum meiri trygg við tað, og kann verða tikið undir við tí. Men har eru viðmerkingar, sum bera á tað borðið, at fólkaflokkurin, hvat tilknýtisætlanum til ES viðvíkur, ein haltar til báðar síður.

At bøta um handilsligu viðurskiftini við ES er bráðneyðugt. Tann bati, sum varð, tá Europeiska Ráðið í mars skrivaði undir skjøl, og sum ger, at Føroyar kunnu útflyta óavmarkaðar mongdir av viðgjørdum vørum til ES tollfrítt, er at fegnast um. Hetta var úrslit av drúgvum og áhaldandi arbeiði í nevnd, sett av báðum pørtum við tí sama í huga. Føroya Landsstýri hevur júst sett aðra nevnd, ið skal lata landsstýrinum álit um, hvussu vit fáa best møguliga marknaðaratgongd til ES. Vit vita, at millum teir flokkar, sum mynda landsstýrið í dag, eru ymiskar hugsanir um framtíðar tilknýti Føroya til ES. Vit loyva okkum tó at trúgva, at nýggja nevndin er før fyri at fremja eina partleysa kanning, sum kann gerast grundarlagið undir nýggjum politiskum tingingum millum Føroyar og ES, tingingum, sum sum mál mega hava eina grundleggjandi nýggja samstarvsavtalu, grundaða á virðing fyri hvør øðrum, og eina avtalu har, sum vísst verður til í uppskoti til samtyktar, oyðandi sokallaða krav ES's, um MVG verður radikalt broytt og helst tikið av.

Tó, í øllum prátinum um marknaðaratgongd til ES mugu vit ikki gloyma tann heim, sum er uttanfyri ES. Stórir marknaðir í Fjarcystri eru lovandi og enn so gott sum óbrúktir av okkum, felagsskapurin NAFTA átti at verið ein sjálvsagdur samstarvspartnari føroyinga, og nú Noreg valdi at standa uttan fyri ES, eigur enn størri áberðsla at verða løgd á samstarvið við hesar ríku grannar okkara saman við Íslandi og Grønlandi.

Við hesum í huga setir minnilutin (Jenis av Rana) fram soljóðandi

U p p s k o t

t i l

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið saman við kanningunum um best møguliga marknaðaratgongd til ES, eisini at gera kanningar við tí endamáli at bøta um handilslig, mentannarlig o.o. viðurskifti okkara við aðrar náttúrligar samstarvsfelagar, herundir lond í Fjareystri, felagsskapin NAFTA og grannar okkara Noreg, Ísland og Grønland.

2. viðgerð 27. apríl 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

2. mai 1995, upprunauppskotið fall við 7-0 atkvøðum, uppskotini frá minnilutunum fullu við ávikavist 8-0 og 6-0 atkvøðum.

16 Avtøka av Fíggingargrunninum frá 1992

Ár 1994, hósdagin 27. oktober legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum alt fyri eitt at krevja av Ríkisstjórnini:

1. at nevndin í Fíggingargrunninum frá 1992 fær føroyskan meiriluta, og
2. at Fíggingargrunnurin frá 1992, so skjótt til ber, verður tikin av.

Viðmerkingar:

Siktið við uppskotinum er at steðga teirri avtofting av Føroyum, sum Fíggingargrunnurin frá 1992 gjøgnum m.a. P/f Føroya Fiskavirking er atvold til.

Upprunaliga uppfataði Javnaðar-/Fólkaflokslandsstýrið Grunnin frá 92 sum eina fyribils nevnd, sum skuldi umsita tað 500 mió. kr. lánið, løgtingið tók í oktober 92 til tess at tryggja framhaldandi rakstur Sjóvinnubankans.

Hóast grunnurin fekk danskan nevndarmeiriluta og leiðslu, var hetta eisini fatanin eftir knappliga vikuskiftisfundin í forsætismálaráðnum 1. februar 1993.

Men brátt vísti tulking landsstýrisins av avtalunum seg at vera í andsøgn til tær ætlanir, sum danskt embætis- og umsitingarvald hevði í kvittanum.

MÓTMÆLI LANDSSTÝRISINS 30. mars
Landsstýrið bar tó skjótt at, tí fyrst tað frættist, at ætlanin var at monopolisera fiskavirkini, sendi landsstýrið forsætisráðnum bræv, dagsett 30. mars (er lagt við uppskotinum), og mótmælti harðliga ætlanini við m.a. hesum orðum:

"Derimod kan landsstyret slet ikke godtage de tanker, som Financieringsfonden har fremlagt om ét produktionsselskab for alle fabrikkerne... Landsstyret mener, at fondens tanker er i strid med aftalen fra 1. februar 1993... Vi mener, at denne sag er så alvorlig, at ... dette emne tages op på det førstkommende møde mellem landsstyret og regeringen".

Á fundi við Ríkisstjórnina 6. aprfl endurtóku umboð landsstýrisins munnliga mótstøðu sína móti at monopolisera fiskavirkini á landi.

FRÁBOÐAN GRUNSINS 14. APRÍL.

Men nevndin í Fíggingargrunninum hevði sína ætlan og skrivar landsstýrinum bræv 14. apríl (avrit lagt við uppskotin um), at hon hevur í hyggju m.a.:

at leggja saman og sanera bert tey virki, ið ynskja tað,
at bøta kapital- og rakstrarstøðuna,
at bestu og mest rationellu virkini halda fram, minst eitt í hvørjari sýslu, men hini verða løgd still og hildin viðlíka.
at opin virki verða framleiðslueindir við dagligari fyrisiting á staðnum, men yvirordnaðari leiðslu centralt,
at dentur verður lagdur á flest møgulig arbeiðspláss,
at virkir seinni kunnu verða seld frá,
at 40 mio. kr. í partapeningi fyrst verða útvegaðar av grunninum, føroysku bankunum o.ø. størri føroyskum investorum, seinni avhendar breiðari fjøld av áhugaðum,
at uppnáa eina"tiltrongda spesialisering og effektivisering".
at bøta planleggingina av framleiðslu, sølu og likviditeti,
at skapa grundarlag fyri munandi betri kappingarføri,
at gagna samfelagsbúskapinum og bøta arbeiðsloysisstøðuna.

Hóast partar av innihaldinum í hesum bræví frá Fíggingargrunninum vóru tølandi, stóð greitt, at ætlanin var eitt fiskavirkismonopol, hóast hetta var brot á avtalurnar (jvbr. mótmæli landsstýrisins 30/3 og 6/4), sum gjørdar vóru við donsku stjórnina um endurreisn av samfelagsbúskapinum.

LANDSFUNDARSAMTYKT JAVNAÐARFLOKSINS

Men beint eftir hetta bræv gongur Javnaðarflokkurin frá felagsstøðu landsstýrisins 30. mars og 6. apríl. Tí á landsfundi leygardagin eftir samtykkir flokkurin m.a.:

"at... Einasta gongda leiðin er ein skjót og vælskipað sanering av fiskaídnaðinum".
at "Javnaðarflokkurin tekur ikki undir við politiskari uppílegging, sum forðar fyri, at saneringsætlanin hjá ognarunum -kreditorunum - í fiskaídnaðinum verður framd".
at "Javnaðarflokkurin leggur áherðslu á, at ætlaða saneringin skal tryggja flest møgulig arbeiðspláss á virkjum - við fjølbroyttari tilvirking á høgum tilvirkingarstigi - kring alt landið."
at "Javnaðarflokkurin harmast um støðutakan Fólkaflokksins í sambandi við saneringsætlanina hjá ognarunum í fiskaídnaðinum, tí ein politisk krappa nú fer at lemja samfelagið uppaftur meiri."
at "Fólkaflokkurin eigur at umhugsa støðu sína, so landsstýrið framhaldandi kann virka fyri at endurreisa føroyska búskapin."

Atfinningin móti Fólkaflokkinum stóðst av føstu mótstøðu Fólkaflokksins móti donsku bankastjórum, sum høvdu tikið búskaparpollitiska valdið í Føroyum, og ætlan teirra var at gera fiskivinnumopol (og seinni bankamopol).

MÓTSTØÐA FÓLKAFLOKSINS

Ikki bara í landsstýri og á løgtingi, men eisini í skrift og talu í fjølmiðlum royndu ting- og landsstýrismenn fólkafloksins saman við vinnulívsmonnum at ávara ímóti skaðanum av einum fiskivinnumonopoli sum Føroya Fiskavirking.

So leingi fólkaflokkurin var í landsstýrinum, var vón um, at hann klárað at fyribyrgja Føroya Fiskavirking. Eftir almennan fund í Havnar Framburðsfelag við Astrup Hansen og endeliga á kvøldarfundi í Tinganesi 21. apríl við donsku bankastjórunum sá út til, at teir fóru at uppgeva monopoliseringina.

22. apríl tveitti javnaðarflokkurin uttan fráboðan fólkaflokkin úr Tinganesi og skipaði við tjóveldis- og sjálvstýrisflokkinum nýggja samgongu. Hetta sosialistiska landsstýrið gav seg við beráddum huga undir danskt kapitalvald á væl fyrireikaðum politiskum samráðingum við stjórnina 28. mai og 12. oktober 1993.

Við búskaparligari makt frá Fíggingargrunninum, politiskari undirtøku úr Tinganesi frá javnaðar-, tjóðveldis- og sjálvstýrisflokkinum og við aktivum stuðuli frá nøkrum føroyskum teknokratum varð Føroya Fiskvirking trokað inn á Føroyar. Lánsskuldin hjá teim uml. 20 upprunaligu flakavirkjunum varð niðurskrivað í einum úr uml. 750 mió. kr. niður í 340.

ÓBÓTALIG SKAÐAÁRIN

Avleiðingarnar av skaðagerðini kenna vit øll í dag: Rakstrarhall eftir fyrsta árið. Eginpeningurin mestsum uppbrúktur. fyrstu 8-9 opnu virkini skjótt skerd í tali niður í 4-5. 15 virki kruvd og skrædlað fyri millióna virði av útgerð. Eini 4-6 enn opin virki spekkað við hesum avmonteraðu maskinunum. Fiskaprísurin í botni. Arbeiðsplássini í fiskaídnaðinum færri enn nakrantíð í 20 ár. Tað besta fólki útihýst frá høvuðsvinnuni og tvingað av landinum. Fyrrverandi virkiseigarar og vinnulívsmenn sleppa ikki til arbeiðis. Teir mistu virkini, hóast tey góvu rakstaravlop so scint sum í 1991, men illa royndust politiskt útvaldu "nýggju vinnulívsmenninir" samfelagnum. Fleiri limir í upprunaleiðsluni á Fiskavirking rýmdir. Leiðslan á monopolinum klárar ikki at forrenta helming. 340 mió. kr. av upprunalánum í flakavirkjunum, men verður lønt fyri dugnaloysið og fær nú lovað 2/3 aftrat í skuldaravskriving av verandi lánifígging, niður í bert 110 mió. kr., t.e. 5 mió. kr. í lánum pr. virki. Slík niðurskriving ger mismun móti teim virkjum, sum strevast uttan fyri Fiskavirking hóast politiskan og bankastuðlaðan ágang.

Allar ávaringar fólkafloksins ímóti Føroya Fiskavirking eru gingnir út sum beiskur veruleiki. Valdsmisnýtsla Fíggingargrunsins, donsku bankastjóranna og sosialistiska landsstýrisins farna árið hava roynst Føroyum illa, og Fiskavirking hevur ríkiliga prógvað sítt skaðaárin á búskapin. Harumframt hevur undirbrotligheitin hjá farna landsstýrinum fyri harraboðum frá donsku leiðsluni í grunninum eisini ført til monopolbankan, kvotaskipanina og aðrar vanlukkur.

SAMA POLITISKA ATGERÐARLOYSIÐ

Eftir løgtingsvalið 7. juli átti so at verið møguligt at gjørt eina nýggja politiska royndd

at bjarga fiskivinnuni á landi og normalisera umstøður hennara. Undir samráðingunum um borgarliga samgongu var semja um at broyta Fiskvirking gjøgnum nevndina í Fíggingargrunninum, og kravdi fólkaflokkurin at fáa í samgonguskjalið, at eitt privat felag sum Fiskavirking má ikki sleppa at forða heilum oyggjum og landspørtum at virka fisk av Føroyagrunninum. Hetta mundi vera ein orsøk til, at sambandsflokkurin heldur valdi sosialistisku samgonguna - ímóti ynskinum hjá føroysku veljarunum.

Men við hesum uppskoti fær sosialistiska-sambands landsstýrið høvi at bøta skaðan aftur. Fiskavirking er privat partafelag, hóast stovnað við fíggjarpolitiskum harðskapi. Tó eigur felagið ikki at verða avsagt við politiskari makt. Tað kann gerast fordømi fyri líknandi politiskum valdstøkum seinni.

Tí miðar hetta uppskotið frá fólkaflokkinum eftir at skapa grundarlag fyri nýggjari byrjan fyri føroyska fiskivinnu á landi á sunnum, vinnuligum grundarlagi og í fríari kapping. Tað gerst best við, at løgtingið áleggur landsstýrinum at krevja av ríkismyndugleikunum,

> at meirilutin í nevnd Fíggingargrunsins verður føroyskur alt fyri eitt,
> at nýggju nevndartimirnir verða valdir eftir skili fyri og verkligum sakkunaleika til vinnulívið, og
> at nýggja nevndin fær til uppgávu 1) at gera nýggjar karmar fyri fiskivinnuna á landi í staðin fyri P/f Føroya Fiskavirking og 2) at avtaka Fíggingargrunnin frá 1992 so skjótt sum praktiskt gjørligt.

1. viðgerð 8. november 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 31. januar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 27. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð 8. november 1994 beint í fíggjarnevndina.

Sjálvt uppskotið til samtyktar er í tveimum.

Fyrra uppskotið áleggur landsstýrinum alt fyri eitt at krevja av ríkisstjórnini, at Fíggingargrunnurin frá 1992 fær ein føroyskan meirilutu.

Seinna uppskotið áleggur landsstýrinum alt fyri eitt at krevja av ríkisstjórnini, at Fíggingargrunnurin frá 1992 so skjótt sum til ber verður tikin av.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Heðin Weihe frá Skrásetting Føroya.

Heðin Weihe svaraði spurninginum í sambandi við "Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde" nr. 247 frá 3. mai 1993 og greiddi frá

reglunum um skráseting av grunnum í Føroyum.

Umboðið fyri Skráseting Føroya upplýsti, at Fíggingargrunnurin ikki er skrásettur í Skráseting Føroya. Skrásetingin hevur fingið skriv dagfest 10. mars 1994 frá grannskoðara grunsins, sum segði, at grunnurin metti, at hann ikki kom undir galdandi "anordning".

Skrásetingin hevur sent málið til Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, sum tekur avgerð í slíkum málum, fyri at fáa greiði á, um grunnurin er ein vinnurekandi grunnur, sum skal skrásetast í føroysku skrásetingini.

Skrásetingin rykti eftir málinum 19. september 1994. Tá varð upplýst, at málið var sent fíggjareftirlitinum at gera viðmerkingar. Skrásetingin rykti aftur ígjøgnum telefon 24. januar 1995, og var svarið, at málið nú var í ídnaðarmálaráðnum.

Verður grunnurin skrásettur í Føroyum, skulu smb. grein 13 minst helvtin av nevndarlimunum vera búsitandi í Føroyum, "medmindre den færøske registreringsmyndighed undtager fra dette krav eller kravet strider mod internationale forpligtelser".

Nevndin hevur í sambandi við viðgerðina býtt seg í ein meirilluta og ein minniluta.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johnnesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariassen, Finnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen) førir fram:

Fíggingargrunnurin frá 1992 kom undan kavi tann 6. oktober í 1992, tá ið tann fyrsta avtalan varð gjørd við donsku stjórnina. Tað var, tá ið Sjóvinnubankin ikki leyk treytirnar hjá fíggjareftirlitinum og noyddist at fáa nýggjan kapital tilførdan.

Grein 3 í avtaluni millum donsku stjórnina og landsstýrið staðfesti, at landsstýrið og íløgugrunnurin fyri Føroyar skuldu seta 500 mió. kr. í nýggjan grunn, sum fekk navnið Fíggingargrunnurin frá 1992.

Grein 6 í avtaluni segði, at leiðslan í grunninum skuldi verða ein 5-manna nevnd, harav 3 valdir av stjórnini og 2 av landsstýrinum. Seinni er nevndin viðkað við 2 føroyskum observatørum, sum ikki hava atkvøðurætt.

Tað stendur einki í sjálvari avtaluni um hvør skal eiga formannin, men landsstýrið bant seg í stovningarsamtyktini til at virða viðtøkurnar hjá grunninum.

Í grein 4 í viðtøknum stendur, at grunnurin verður stjórnaður av eini nevnd, ið hevur 1 formann og 4 aðrar limir. Danska stjórnin tilnevnir formannin og landsstýrið næstformannin.

Fólkaflokkurin førir í viðmerkingunum fram, at tásitandi landsstýrið uppfataði upprunaliga Fíggingargrunnin frá 1992 sum eina fyribilsnevnd, men í avtaluni við danir stendur einki um at talan er um eina fyribilsnevnd, tað stendur heldur einki um hetta

í stovningarsamtyktini ella í viðtøkunum.

Meirilutin heldur tó, at fyritreytirnar fyri nevndarvalinum eru burtur nú.

Í viðtøkunum stendur, at landsstýrið velur nevndina, tá landskassans skuld til statin er afturgoldin. Tá var talan um 500 mió. kr. í láni, og afturgjaldstíðin var yvirskoðilig.

Nú skyldar landskassin statinum uml. 6,5 mia. kr. Hetta ger tað rímiligt og neyðugt at broyta viðtøkurnar hesum viðvíkjandi.

Meirilutin heldur ikki, at Fíggingargrunnurin frá 1992 er ein loysn, sum er snoygd niðuryvir føroyingar, tí bæði landsstýrið og løgtingið hava góðtikið avtaluna við danir.

Fíggingargrunnurin frá 1992 er tað amboðið, sum danska stjórnin og táverandi samgongan í felag valdu at nýta fyri at fáa skil aftur á føroyska bankakervið og fyri at minka um yvirkapacitetin hjá vinnuni.

Í grein 2 í viðtøkunum hjá grunninum stendur, at endamálið hjá grunninum er

1) at skjóta inn og eiga ognarfæ sum partapening ella ábyrgdarpening í størri føroyskum bankum, jbr. grein 7 (sum vísir til Sjóvinnubankan)
2) at fremja ein virknan eigaraleiklut í avvarðandi bankum og
3) at leggja støði undir ella vera við í bygnaðartillagingum av føroyska vinnulívinum. Stk. 2. Grunnurin kann fyri at røkja sítt endamál stovna felløg.

Teir, sum orðaðu viðtøkurnar hjá Fíggingargrunninum tóku longu í oktober 1992 hædd fyri, at grunnurin kundi gerast eigari av fleiri bankum, tí orðingin stendur í fleirtali.

Spurningurin um føroyskan meirilutu í Fíggingargrunninum, soleiðis sum fólkaflokkurin í løgtingsmáli nr. 16/1994 skjýtur upp, hevur verið frammi fyrr.

Tann 21. september 1993 sendi táverandi løgmaður Marita Petersen bræv til Mogens Lykketoft, har punkt 5 var soljóðandi:

"På Færøerne er der udbredt utilfredshed med, at det ikke er personer med kendskab til og fornemmelser for det færøske samfund, udpeget af færøske myndigheder, der leder bankvæsenet og bankernes overordnede, Finansieringsfonden af 1992.

Fondens sammensætning, udpegelse og ledelse bør derfor blive genstand for reforhandling.

Ligeledes forekommer det i høj grad usædvanligt, at såvel direktion som bestyrelse fortsætter i banker, der reelt er gået fallit flere gange. En fornyelse, helt eller delvis, bør derfor ske."

Tann 13. oktober 1993 móttók Føroya landsstýri svar frá Mogens Lykketoft, sum

skrivaði:

"Sammensætningen af bestyrelsen i Finansieringsfonden af 1992 blev aftalt mellem Landsstyret og den danske regering i efteråret 1992. Det er dog senere blevet indføjet, at det færøske landsstyre ud over 2 repræsentanter, hvoraf den ene er næstformand, udpeger 2 tilforordnede bestyrelsesmedlemmer.

Det fremgår endvidere af vedtægterne for Fonden, at når det færøske landsstyres lån fra den danske stat til indskud i Fonden og til andre formål er tilbagebetalt, udpeges hele Fondens bestyrelse af Landsstyret. Der er således taget højde for, at færøske interesser kan blive fremført i Fondens bestyrelse, og at Fonden på et senere tidspunkt helt kan overtages af det færøske landsstyre. Jeg ser ingen grund til at ændre i denne kompetencefordeling.

Vedrørende bestyrelsen og direktionen i de to færøske banker kan jeg oplyse, at der skete ændringer i bestyrelsen for Føroya Banki i forbindelse med den Danske Bank's rekonstruktion af banken i efteråret 1992, og at bestyrelsesformændene for de to banker agter at træde tilbage i nær fremtid.

Endelig synes jeg, at det er vigtigt at påpege, at det naturligvis er intentionen med fusionen af de to banker, at der skal ske en styrkelse af bestyrelsen i den nye fusionerede bank. Dette er endnu en god grund til at fastholde fusionen af bankerne, jvf. også Landsstyrets og bankernes pressemeddelelser herom."

Føroya landsstýri lænti í tíðarskeiðnum frá 6. oktober 1992 til árslok 1993 3.150 mió. kr. frá danska statinum, og fór meginparturin av hesari upphædd til at bjarga bankunum. Pengapolitikkur og eftirlit við peningastovnum er ríkismál og er ikki yvirtikið av heimastýrinum. Tí er tantvegis ivingarsamt, um landsstýrið og Føroya løgting høvdu skyldu til at yvirtaka skuldina, sum stavaði frá bankabjargingunum.

Fíggingargrunnurin má metast sum ein kreditorfoysn, sum danska stjórnin hevur tikið stig til, og sum landsstýrið og løgtingið sum debitorar hava góðtikið. Tað er ikki órímiligt, at danski staturin sum kreditor er umboðaður í nevndini, men meirilutin heldur ikki, at tað er rætt, at danska stjórnin eigur meirilutan í nevndini, tí Føroya landsstýri er formligur áuari av Fíggingargrunninum frá 1992. Samsvar er ikki millum ognarviðurskiftti og ávirkan. Meirilutin setir tískil fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við donsku stjórnina við tí fyri eyga at broyta viðtøkurnar hjá Fíggingargrunninum frá 1992 soleiðis, at landsstýrið velur atkvøðumeirilutan í nevndini.

Meirilutin heldur, at tað er rætt at hava frástøðu millum politiska valdið og bankarnar, og tekur tí ikki undir við uppskotinum hjá fólkaflokkinum um at taka Fíggingargrunnin av.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) mælir til at samtykkja uppskot fólkafloksins.

Tá uppskotið frá meirilutanum er í tráð við uppskot nr. 1 hjá fólkaflokkinum, tekur minnilutin í øðrum lagi undir við uppskotinum hjá meirilutanum.

2. viðgerð 2. februar 1995. Upprunauppskotið fall við 5-0 atkvøðum. Uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

17 Javnbjóðis skatting av hjúnum og støkum

Ár 1994, hósdagin 27. oktober legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri tingið við gildi frá 1. januar 1995 uppskot um broyting í skattalógini, so at hjúnafelagar við eini inntøku verða skattaðir hvør sær av helminginum av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum.

Viðmerkingar:

Uppskotið miðar ímóti at býta inntøkuna hjá hjúnum, har bert annað teirra hevur løntararbeiði, sundur í tvær skattskyldugar inntøkur, so hjún við bert tí eini inntøkuni verða skattliga javnstillað hjúnum ella samlívandi persónum, sum hava tvær inntøkur.

Eisini verður hetta uppskotið ein skattligur lætti hjá hjúnum, har annar hjúnafelagin hevur stóra og hin lítla inntøku.

Uppskotið er í tráð við Fólkafloksins uppskot nr. 78/93 í farnu tingsetu um endurreisn av búskapinum, lækking av kostnaðarstøði, lækking av skattastiganum og bruttoskatting.

Verandi skattaskipan hevur m.a. tann innbygda órætt í sær, at húsarhald við einari inntøku verða harðari skattað enn húsarhald, har tvey eru um at forvinna inntøguna.

Til dømis ber ein inntøka uppá 200.000 kr. 95.000 kr. í skatti, meðan tvær inntøkur upp á 200.000 kr. tilsamans bert verða skattaðar 75.000 kr. samanlagt. Sostatt verða hjúnini, har bert annað er í løntari vinnu og tjenar 200.000 kr. skattað 20.000 kr. harðari, enn har báðir hjúnafelagarnir forvinna 100.000 kr. í part.

Hetta dømi kann skiljast so, at hjún, har bæði arbeiða, kunnu forvinna 240.000 kr. tilsamans (120.000 kr. í part), áðrenn tey verða skattað líka hart, nevniliga 95.000 kr., sum tann eina inntøkan uppá 200.000 kr., hóast tvey skulu liva av hesum.

Fara vit hægri upp í inntøku- og skattastigan, t.d. 300.000 kr. í einari mótvegis tveimum inntøkum, verður mannamunurin móti húsarhaldinum við einari inntøku enn ljótari.

Harumframt veitir hitt almenna barnafamilju, har bæði foreldur arbeiða úti, t.d. barnaansing, sum kostar hinum almenna uml. 40.000 kr. um árið pr. barn á stovni. Men hjún, har annar hjúnafelagin arbeiðir heima, fáa ikki líknandi sømdir og verða fyri fíggjarligum vanbýti av at ansa sínum egnum børnum. So her gerst almenna diskriminceringin móti barnafamiljuni við einari inntøku enn størri.

Henda skattliga diskriminering móti familju við bert einari inntøku merktist minni meint tey villu 80-árini, tá tíðarandin lokkaði og hækkandi gjaldsskyldur til skatt og hús noyddu báðar hjúnafelagarnar úr heiminum út á arbeiðsmarknaðin, har ovmikið var fyri allar hendur.

Men nú eru tíðirnar broyttar. Hjá hundraðtals familjum eru báðar lønarinntøkurnar avloystar av tveimum lágum arbeiðsloysisgjøldum. Hjá hundraðtals hjúnum er onnur inntøkan burtur, so livast má av lægri (samlaðari) inntøku, men skatturin er hækkaður.

Hetta uppskotið hevði, umframt at innføra eitt sjálvsagt rættvísi í skatting av familjuinntøkum yvirhøvur, eisini fört til, at hjún, ið hava mist aðra inntøkuna, sluppu meir rímiligt í skatti enn nú. Tað kundi stuðlað foreldrum til, at annað valdi at arbeiða heima undir uppvøkstrinum hjá børnunum soleiðis, at tað varð nakað rúmligari á arbeiðsmarknaðinum. Tað kundi givið onkrum, sum er trokaður út í arbeiðsloysi, høvi aftur at sleppa í lønta vinnu.

Landskassin hevði mist nakrar 10 mió. kr. í inntøku upp á stutt sikt, men av tí, at tað alt ov høga skattatrýstið og tann lutfallsliga alt ov stóri almenni sektorurin er mest atvoldin til, at búskapur og samfelag okkara eru sjúk, verður ein lægri landskassainntøka bert til frama fyri samfelagið sum heild.

1. viðgerð 8. november 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 24. november 1994 legði fram soljóðandi

álit

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum tann 27. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð tann 8. november 1994 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hildið fund við Petur Alberg Lamhauge og Torbjørn Mikkelsen frá Toll- og Skattstovu Føroya, ið upplýstu at skal fyriliggjandi lógaruppskot fremjast verður neyðugt við sera umfatandi lógarbroytingum, umframt broytingum í telduskipanini og at hetta verður tíðarkrevjandi og kostnaðarmikið. Nevnt varð at broytingarnar, sum skotnar upp, fara at kosta umleið 30 mió. kr.

Skattanevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin (Sune Jacobsen, Karl Robert Johansen, Vilhelm Johannesen og Finnbogi Ísakson) vísir til omanfyri standandi og heldur tí at umrøddu lættar mugu kannast væl og setir tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at kanna avleiðingar av einari slíkari skipan sum uppskotið miðar ímóti.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) tekur undir við uppskoti fólkafloksins, men í aðru syftu verður tikið undir við meirilutanum.

2. viðgerð 29. november 1994. Upprunauppskotið fall við 7-0 atkvøðum. Uppskotið frá meirilutanum í skattanevndini varð samtykt við 20-0 atkvøðum.

18 Áheitan frá ákæruvaldinum sambært § 728a í rættarskipannarlógini

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði formansskapurin fram soljóðandi:

Viðvíkjandi § 24, stk. 1 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum frá 13. mai 1948.

Løgtingsformaðurin hevur frá Føroya Landfúta fingið skriv dagfest 26. november 1993, har biðið verður um, at løgtingið samtykkir sambært § 728a í rættarskipannarlógini, at ákæra eftir § 183, stk. 3, í straffilógini verður at fremja móti Heina O. Heinesen, tingmanni, Kunoy.

Hjálagt er nevnda skriv Landfútans.

Sostatt verður sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Formansskapurin mælir til, at løgtingið samtykkir, at áheitan Landfútans um, at ákæra verður reist, verður gingin á møti.

1. viðgerð 21. oktober 1994. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 27. oktober 1994. Uppskotið samtykt við 20-0 atkvøðum.

19 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

UPPSKOT

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Sum nýggj § 33 nr. 14 verður sett:

"Upp til 10.000,00 kr. sum í árinum eru settar sum partapeningur í smápartafelløg ella skrásett í Føroyum, tó í mesta lagi 30.000,00 kr. tilsamans í trý fylgjandi ár."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

Som ny § 33 nr. 14 indsættes:

"Op til 10.000,00 kr. der i årets løb er indsat i anpartsselskaber eller aktieselskaber på Færøerne, dog højst 30.000,00 kr. ialt i tre på hinanden følgende år."

§ 2

Denne lov træder i kraft 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Neyvan fara Føroyskir politiskir myndugleikar at fáa eitt bein til jørðina, um teir spurningar sum truka mest á, ikki fáa eina skjóta politiska og arbeiðsmarknaðarliga viðgerð.

Leingi hevur talið á arbeiðsleysum føroyingum verið alt ov stórt, og vandi er fyri, at støðan versnar dag frá degi, og skulu vit hugsa um at fáa fleiri hendur í arbeiði, so skal virksemi í samfelagnum økjast, so at gongd kann fáast á aftur.

Í dag eru 22% av arbeiðsføra fólkinum í vinnuloysi, ella 4.500 fólk, og verður einki gjørt kann roknast við, at talið økist uppaftur meira um einki verður gjørt til tess at skipa nýggj arbeiðspláss, og tí ber ikki til at lata standa til; politisku myndugleikarnir og arbeiðsmarknaðurin hava skyldu at standa saman tá um ræður landsins framtíð.

Tørvur er á peningi til vinnuendamál á nærum øllum økjum, og tí er tørvur á, at ein

partur av tøka peninginum, sum enn finst í Føroyum og í útlandinum, verður brúktur til vinnuskapandi tiltøk.

Hetta uppskotið miðar ímóti, at fáa gongd aftur á vinnuna, og at fólk sum seta pening í arbeiðsskapandi tiltøk, yvir eitt ávíst tíðarskeið fáa møguleika at draga upphæddina frá á sjálvuppgávuni. Hugsað verður um, at øll fólk, sum seta partapening í smápartafeløg ella partafeløg, skrásett í Føroyum, skulu kunna trekkja frá upp til kr. 10.000,00 á sjálvuppgávuni eitt einstakt ár, og upp til kr. 30.000,00 yvir trý fylgjandi ár.

Møguleikin fyri, at kommunur sum hava møguligan tøkan pening, skulu hava møguleika at stuðla vinnuvirkjum á staðnum, kortini við ikki meira enn 10% av partapeninginum, eigur at verða kannaður.

Eisini feløg á arbeiðsmarknaðinum, sum hava fleiri milliónir krónur til ymisk endamál, eiga at fáa møguleika fyri at brúka partar av sínum peningi til hetta endamál. Hetta kundi t.d. verið gjørt á tann hátt, at feløgini læna pening til limir sínar, sum arbeiða á virkjum, á henda hátt fáa teir møguleika at seta partapening í virki, og skal upphæddin afturgjaldast feløgunum eftir góðkendari reglugerð. Samráðingar eiga at verða tiknar upp við vinnufeløgini um hesar spurningar.

Eitt slíkt uppskot sum hetta kemur helst í fyrstu syltu at kosta landskassanum pening, men endamálið við uppskotinum er, at økta virksemið skal fíggja uppskotið.

Undir viðgerðini hevur spurningurin um uppskotið bert skuldi fevna um ávísar nýggjar vinnur verið viðgjørdur, umframt spurningin um talan skuldi verða um aldursbólkar av fólki sum skuldu fáa hendan møguleika, men uppskotsstillararnir meta tað ikki rætt, at seta avmarkingar í uppskotið, hvør skal sleppa at seta í eitt ávíst virki ella ikki, og halda tað er rætt, at viðgerðin av uppskotinum gevur ábending um hetta.

1. viðgerð 27. oktober 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 17. februar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 18. oktober 1994, og aftaná fyrstu viðgerð tann 27. oktober 1994 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið.

Vísandi til álitið um arbeiðsskapandi politikk og møguleikarnar í hesum sambandi m.a. at fáa lán úr framtaksstovninum, stuðul til nýggjar vinnur og veðhald úr ábyrgdargrunninum til nýggjar verkætlanir, metir skattanevndin, at tað er neyðugt at viðgera málið gjøllari.

Í umrødda áliti verður sagt, at partapeningur við skattafrádráttarrætti hevur ikki verið

givin í Føroyum áður, og heldur ikki í grannalondum okkara, tó undantikið Ísland, har tílíkur frádráttur hevur verið galdandi síðani 1984 og er nógv nýttur í dag.

Skulu vit hava eina slíka skipan, verður neyðugt at meta um, hvat skipanin fer at kosta í fyrsta umfari, og í hvønn mun og hvussu skjótt, hon kann koma at svara seg aftur.

Ein samd skattanevnd setir tí fram soljóðandi:

u p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at kanna avleiðingarnar av uppskotnu skipanini.

2. viðgerð 23. februar 1995. Upprinauppskotið fall við 4-0 atkvøðum. uppskotið frá samdari skattanevnd samtykt við 28-0 atkvøðum.

20 Broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

UPPSKOT

til

<u>løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.</u>

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju verður henda broyting gjørd:

Sum nýggj § 1 A verður sett:

"Gjaldið til landskassan verður frá 1. januar 1995 0,66 kr. pr. litur, 1. januar 1996 0,38 kr. pr. litur, 1. januar 1997 0,28 kr. pr. litur og 0,00 kr. pr. litur við gildi frá 1. januar 1998."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1995.

<u>lagtingslov om ændring i lagtingslov om særlig afgift på brændselsolie.</u>

§ 1.

I lagtingslov nr. 179 af 18. desember 1992 om særlig afgift på brændselolie foretages følgende ændring:

Som ny § 1 A indsættes:

"Afgiften til landskassen bliver fra 1. januar 1995 0,66 kr. pr. liter, 1. januar 1996 0,38 kr. pr. liter, 1. januar 1997 0,28 kr. pr. liter og 0,00 kr. pr. liter med gyldighed fra 1. januar 1998."

§ 2

Denne lov træder i kraft 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Tey seinnu árini eru alsamt fleiri og fleiri byrðar lagdar á fólk, og henda gongdin kann ikki halda fram. Hetta er tí orsøkin til, at mælt verður til at gera broytingar í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.

Endamálið við hesi broyting er, at avgjaldið á brenniolju skal avtakast í seinasta lagi 1. januar 1998. Serliga avgjaldið á brenniolju er í dag uppá 0,95 kr. pr. litur, og upphæddin skal sambært uppskotið minkast við 30% í 1995, 40% í 1996 og 30% í 1997.

Uppskotsstillararnir kundu annars hugsa sær, at avtikið serliga avgjaldið á brenniolju undir einum, men hava mett; at hetta ikki er politiskt gjørligt, og mæla tí til at hetta verður gjørt í stigum, fyri at fáa eina so breiða undirtøku fyri uppskotinum sum gjørligt, og fyri at geva landskassanum møguleika fyri at laga seg eftir minkandi inntøku.

Nærum 50% av oljurokningini sum fólk fáa eru avgjøld, og tað halda uppskotstillararnir ikki verða rímuligt soleiðis sum støðan er í okkara samfelag.

Í ár vóru avsettar 77 mió. kr. sum inntøka á fíggjarlógini, men av tí at ávís MVG skrásett vinnuvirki fingu serligar sømdir, lækkaði inntøkan niður á 66 mió. kr. Um tølini annars verða tey somu, lækkar serliga innflutningsgjaldið við 20 mió. kr. fyri 1995 eftir hesum uppskotinum.

Ein slík lækking og avtøka av serliga avgjaldinum á brenniolju, kemur nærum øllum skattaborgarum landsins til góðar, og tí má uppskotið metast at verða sera rímuligt og neyðugt.

Uppskotið hevur til endamáls, at koma hart kroystu famuljunum til hjálpar, og at tryggja øllum sethúsaeigarum betur kor at arbeiða undir, og tí verður mett rætt, at løgtingið eigur at medvirka soleiðis, at trýstið á egnan bústað ikki økist uppaftur meira, men heldur miða eftir, at førdur verður ein politikkur, sum í nógv størri mun lættir um trýstið hjá fólkið og tryggjar umstøðurnar hjá familjum, ið eiga egnan bústað.

1. viðgerð 27. oktober 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 10. november 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum. Føroya framburðs- fiskivinnuflokki tann 18. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð tann 27. oktober 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen og Álvur Zachariasen) vísir á, at landsstýrið arbeiðir við lógaruppskotum ið hava til endamáls at lækka avgjaldstrýstið og setir tí einki uppskot fram í samband við hetta málið.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, Finnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen) vísir á, at málið sambært tingskipanini eigur at viðgerast í skattanevndini og mælir tí til, at málið verður beint í hesa nevnd og setir fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Málið verður beint í skattanevndina.

2. viðgerð 11. november 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. november

1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. oktober 1994 eftir 1. viðgerð 27. oktober 1994 beint í fíggjarnevndina. Fíggjarnevndin legði fram álit 10. november 1994 og samtykti løgtingið tann 11. november 1994 at beina málið aftur í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og vísir **meirilutin** (Sune Jacobsen, Vilhelm Johannesen og Karl Robert Johansen) til støðu meirilutans í fíggjarnevndini har sagt verður, "at landsstýrið arbeiðir við lógaruppskotum, ið hava til endamáls at lækka skattatrýstið" og setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Finnbogi Ísakson) setir einki uppskot fram.

2. *viðgerð 29. november 1994. Uppskotið fall við 7-0 atkvøðum.*

21 Avskriving av sethúsaskuld

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

UPPSKOT

til

løgtingslóg um avskriving av sethúsaskuld.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað gjøgnum Húsalánsgrunnin at keypa prioritetsrættindi til sethús frá fíggjarstovnum, sum vilja avskriva munandi part av láninum, og strika skuld hjá fólki so javnt sum gjørligt.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er samtykt.

lagtingslov om afskrivning af gæld i parcelhuse.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til gennem "Húsalánsgrunnin" at opkøbe prioriteter i parcelhuse fra finansieringsinstitutter der har til hensigt at afskrive væsentlig part af lånet og at eftergive private låntageres gæld så meget som muligt

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelsen.

Viðmerkingar:

Víst verður til uppskot Kristiliga Fólkafloksins í løgtingssetuni 1993 um avskriving og niðurfrysting av sethúsaskuldini, løgtingsmál nr. 179/1993, til skattafrádrátt fyri rentur til sethúsalán, løgtingsmál nr. 154/1993, og um loyvi til Húsalánsgrunnin, Menningargrunnin og Ídnaðargrunnin at rentunullstilla útlán og gera neyðsemjur (akkordir), løgtingsmál nr. 35/1993.

Harumframt kann verða víst til samgonguskjalið, sum var undirskrivað av teimum 18 løgtingsmonnunum hjá Sambandsflokkinum, Fólkaflokkinum, Kristiliga Fólkaflokkinum og Miðflokkinum hin 30. august 1994, har semja var um at skunda undir eina sanering av sethúsaskuldini t.d. á tann hátt, at peningur, sum er avsettur móti tapum í sethúsaskuld, verður aktiveraður og brúktur at skuldaravskriva sethúsalánini.

Tann meiriluti, sum var fyri samgonguskjalinum hin 30. august 1994, má framvegis haldast vera í løgtinginum fyri at loysa átroðkandi spurningin viðvíkjandi sethúsa-

skuldini bæði hjá teimum, sum framvegis sita í húsum sínum, og hjá teimum, sum hava mist húsini, men mugu dragast við eini stórari skuldarbyrðu, sum tey ongan møguleika hava til at sleppa burturúr uttan so, at avskrivað verður.

1. viðgerð 27. oktober 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 10. november 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð tann 27. oktober 1994 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og vísir á, at samsvar ikki er millum føroyska og danska tekstin í greinunum 1 og 2.

Í grein 1 í uppskotinum stendur "so **javnt** sum gjørligt", men danski teksturin sigur "så **meget** som muligt".

Í grein 2 stendur, at lógin kemur í gildi "dagin eftir, at hon er **samtykt**", men danski teksturin sigur, at lógin "træder i kraft dagen efter **kundgørelsen**".

Ein samd fíggjarnevnd vísir á uppskot nevndarinnar til samtyktar í álitinum í løgtingsmáli nr. 13/1994: Aktivering av avsettum peningi móti tapum í sethúsaskuldini.

2. viðgerð 22. november 1994. Málið varð aftur tikið.

22 Lækking av kostnaðinum á heilivági

Ár 1994, týsdagin 18. oktober legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, vegna miðflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til, at kostnaðurin á heilivági lækkar.

Viðmerkingar:
Tá lógin um MVG-gjald varð samtykt, avgjørdi samgongumeirilutin samstundis, at fólkið, ið her búleikast, skuldi gjalda meiri fyri heilivágin - oman á so mangt annað.

31. august 1993 legði undirritaði uppskot á ting har skotið varð upp at gera broytingar í lógini um meirvirðisgjald, soleiðis at m.a. heilivágur varð undantikin meirvirðisgjaldi. Uppskotið fekk tíverri ikki undirtøku og fall.

Undir viðgerðini førdu landsstýrismenn fram, at ikki var neyðugt at fríta heilivág fyri MVG, tí tað væl bar til, at lækka prísin á heilivági á annan hátt. Tey, sum hava heilivág fyri neyðini, hava av sunnum kent avleiðingarnar av, at landsstýrið hækkaði prísirnar á heilivági við heilum 23%. Her er talan um 23%, sum verða løgd oman á útsøluprísin ístaðin fyri tey 6%, sum vóru á innflutningsgjaldi. Henda hækking hevur rakt meint og kennist sum steinur oman á byrðu hjá mongum húski og einstaklingum kring landið.

Ein ikki óhugsandi avleiðing er helst, at fólk himpra seg við at keypa tann av læknum fyriskipaða heilivág.

Vónandi setir landsstýrið seg inn í støðu teirra, sum hava heilivág fyri neyðini og sum í hesum døgum, orsakað av øðrum tiltøkum hjá undanfarnu landsstýrum, hava sera trupult við at fáa endarnar at røkka.

Onnur avleiðing er, at viðgerðarstovnar (sjúkrahús, røktarheim v.m.) í ólukkumát merkja príshækkingarnar á heilivági. Hetta er sera óheppið, har raksturin frammanundan er skorin at beini. Tað er heilt órímiligt, at ein so týðandi vøra sum heilivágur fyri mong er vorðin so kostnaðarmikil, at hann ikki er keypandi.

Tí má landsstýrið nú taka neyðug stig soleiðis, at føriteikin til at keypa neyðugan heilivág ikki verður ein spurningur um, hvat fólk eiga á bankabók.

1. viðgerð 27. oktober 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. november 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum tann 18. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð 27. oktober 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og **er samd** um at seta fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum, at kannaðir verða møguleikarnir fyri at lækka kostnaðin á heilívági.

2. viðgerð 29. november 1994. Upprunauppskotið fall við 7-0, uppskotið frá samdari figgjarnevnd samtykt við 20-0 atkvøðum.

23 Løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn

Ár 1994, fríggjadagin 21. oktober legði Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, vegna tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT

til

løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn.

§ 1. Við tí endamáli at tryggja inntøkur útróðrarmanna verður landsstýrinum heimilað at útgjalda mánaðarligan minstaforvinning til manning á fiskiførum á útróðri á føroysklu landleiðini.

§ 2. Manning á fiskiførum á útróðri á føroysku landleiðini kann verða latin mánaðarligur minstiforvinningur. Treytin fyri mánaðarligan minstaforvinning er, at fiskifarið hevur avreitt minst 10 ferðir seinastu 3 mánaðarnar, at manningin verður avroknað eftir útróðrarsáttmálanum og í tali er sum vanligt er á staðnum, at øll veiða verður avreidd undir einum, og at fiskifarið avreiðir minst 25 kilo uppá mannin fyri hvørja avreiðing.

§ 3. Um manning á útróðrarfari skal koma undir skipanina við mánaðarligum minstaforvinningi fyri útróðrarmenn, skal bátsformaðurin fyri hvønn mánað lata Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna skrivliga fráboðan og lista yvir manning. Fráboðanin og listin yvir manningina skal vera Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna, undirskrivað av manning og bátsformanni, í hendi í seinasta lagi 1. dagin í

lagtingslov om månedlig mindsteindtægt til registrerede hjemmefiskere.

§ 1. Med det formål at sikre hjemmefiskernes indtægter er Landsstyret bemyndiget til at udbetale månedlig mindsteindtægt til mandskab på fartøjer i hjemmefiskeri i færøsk fiskerizone.

§ 2. Til mandskab på fartøjer i hjemmefiskeri i færøsk fiskerizone kan ydes månedlig mindsteindtægt. Betingelsen for udbetaling af månedlig mindsteløn til hjemmefiskere er, at fiskefartøjet har indhandlet mindst 10 gange de sidste 3 måneder, at mandskabet bliver afregnet efter hjemmefiskerikontrakt og i antal er som sædvane er på stedet, at fangsten bliver indhandlet samlet, og at fiskefartøjet indhandler mindst 25 kilo pr. mand hver indhandling for fiskefartøjer som fisker med langline og mindst 15 kilo pr. mand for hver indhandling for fiskefartøjer som fisker med snelle eller snøre.

§ 3. Såfremt mandskabet på et hjemmefiskerfartøj skal komme ind i ordningen med månedlig mindsteindtægt for hjemmefiskere, skal bådsformanden for hver måned sende Fiskernes Lønudligningsfond skriftlig tilmelding og liste over mandskabet. Tilmelding og liste over mandskabet skal være Fiskernes Lønudligningsfond ihænde, underskrevet af mandskab og bådsformand, senest den 1. i den måned i hvil-

mánaðinum ætlanin er at koma undir skipanina, tó fyrstu ferð í seinasta lagi tveir dagar eftir, at lógin er lýst.

§ 4. Mánaðarligur minstaforvinningur til útróðrarmenn er sama upphædd sum mánaðarliga útgjaldið frá arbeiðsloysistryggingini. Um minstaforvinningur, fiskipartur og onnur inntøka hjá útróðrarmanni samanlagt fer upp um kr. 12.725,00 um mánaðin útgoldið verður fyri, verður minstaforvinningurin minkaður við sama krónutali, sum øll inntøkan fer upp um kr. 12.725,00.

§ 5. Um avloysari ella nýggjur maður kemur við á fiskifar fyri annan mann, fráboðar bátsformaðurin Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna hvørjar dagar, viðkomandi maður skal hava minstaforvinning fyri.

§ 6. Mánaðarligur minstiforvinningur til útróðrarmenn verður avroknaður mánaðin eftir, at hann er vunnin, so skjótt sum mánaðar uppgerðin er innkomin.

§ 7. Útróðrarmenn velja sjálvir, um teir koma undir hesa skipan, mynstra ella fáa minstaforvinning eftir gomul skipanini.

§ 8. Henda lóg fær gildi 1. november 1994.

ken man agter sig under ordningen, dog første gang senest to gange efter, at loven er bekendtgjort.

§ 4. Måndedlig mindsteindtægt til hjemmefiskere er samme beløb som månedlig udbetaling fra arbejdsløshedsforsikringen. Hvis hjemmefiskernes mindsteindtægt, fangstandel og anden indtægt sammenlagt overstiger kr. 12.725,00 i den måned, som der skal udbetales for, reduceres mindsteindtægten med samme antal kroner som hele indtægten overstiger kr. 12.725,00.

§ 5. Om afløser eller ny mand kommer med på fiskefartøj for anden mand eller om mand fratræder sin stilling meddeler bådsformanden i den månedlige opgørelse Fiskernes Lønudligningsfond, hvilke dage vedkommende mand skal have mindsteindtægt.

§ 6. Månedlig mindsteindtægt til hjemmefiskere bliver afregnet måneden efter den er optjent, så hurtigt som den månedlige opgørelse er indkommet.

§ 7. Hjemmefiskere vælger selv, om de kommer med i denne ordning, mønstrer eller får mindsteindtægt efter den gamle ordning.

§ 8. Denne lov træder i kraft 1. november 1994.

Viðmerkingur:

Við tí endamáli at tryggja útróðrarmonnum ein mánaðarligan minstaforvinning, sum svarar í minsta lagi til mánaðarliga útgjaldið frá arbeiðsloysistryggingini, sum í dag er 67% av eini arbeiðsmannaløn. Minstalønin hjá mynstraðum útróðrarmonnum er í dag kr. 12.725. 67% av hesi upphædd er kr. 8.525,75. Verður útgjaldið 70% verður upphæddin kr. 8.907,50. Í mars og apríl mánað í ár var ein royndarskipan við minstuløn til útróðrarmenn í gildi, har útgjaldið var kr. 7.500 um mánaðin og vóru

nógvir útróðrarmenn glaðir fyri hesa skipan, tí tað ikki var neyðugt við tí nógva túratalinum.

Um nú tað hendir, sum landsstýrið hevur boðað frá, at útgjaldið frá arbeiðsloysistryggingini verður hækkað til 80%, so skuldi mánaðarligur minstiforvinningur til útróðrarmenn hækkað samsvarandi, 80% av kr. 12.725 ella til kr. 10.180.

Tá miðað verður eftir at hava sama útgjald sum arbeiðsloysistryggingin, er tað tí at tað skal loysa seg betri at rógva út enn at ganga arbeiðsleysur. Hetta er sjálvandi treytað av at fiskað verður fyri eitt ávíst krónutal í fiskiparti. Sjálvandi kundi upphæddin verið størri, men tað er vandi í hvørjari vælferð. Tað kundi skjótt elvt til at nógvir, sum ganga arbeiðsleysir í dag høvdu skrásett seg sum útróðrarmenn. Tað eru mangir smábátar til í Føroyum. Tað kann heldur ikki verða meiningin at fáa fleiri útróðrarmenn sum fiskiskapurin er í løtuni. Latið okkum tryggja teir, sum enn hanga í.

Fyrimunurin við hesi skipanini er, at útróðrarmenn eru líka fyri lógini sum øll onnur tá talan er um at vera skrásettur sum arbeiðsleysur. Hetta hevur verið serliga trupult hjá teimum sum sjálvir eiga bát. Um hesar báðar lógir verða samskipaðar skuldi tað verið gjørligt at loyst henda trupulleika.

Um nú t.d. bátsformaður (eigari/eigarar) ger (gera) av at lata bátin liggja í nakrar mánaðar tí at tað ikki loysir seg at rógva út ella kvotan t.d. er uppfiskað, skal tað verða gjørligt at skráseta manningina í arbeiðsloysistryggingini. Hetta skal eisini verða galdandi fyri eigaran, um hann hoyrir til manningina.

1. viðgerð 10. november 1994. Málið varð beint í fiskivinnunevndina.

Málið varð ikki liðugt avgreitt.

24 Kanning av samanleggingini av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka

Ár 1994, hósdagin 8. desember legði Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at heita á forsætisráðharran at seta í verk eina óhefta og serkøna kanning, sum skal lýsa:

1) partabrævabýtið í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum 22. mars 1993,

2) endaligu samanleggingina seinni á sumri í 1993.

Viðmerkingar:

Rembingarnar í føroyska bankaheiminum seinastu árini, sum endaðu í bankasamanleggingini, høvdu við sær ovurstór tap og harav neyðug innskot í bankakervið. Tikið samanum, hevur bjargingin av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka kostað umlj. 3.300 mio. kr. Føroyski skattgjaldarin hevur goldið 2.650 mio. og Den Danske Bank 650 mio. kr.

Fyri hevur verið fram, at Sjóvinnubankin og Føroya Banki vóru í somu støðu, tá fíggjargrundarlagið ruddi undan teimum. Eingin ørsøk er heldur at halda nakað annað, og hava allar frágreiðingar higartil, sum látnar eru myndugleiktinum og almenninginum, stuðlað hesi fatan.

Tí kundi samlaða tapið (sí niðanfyri) verið lutað millum bankarnar við støði í fíggjarstøðu teirra miðskeiðis í '92. Verður roknað við, at fíggjarstøðan var 5 mia. í Sjb. og 6,5 mia. í FB, kundi tapið samanlagt, 3.300 mio. kr, verið býtt soleiðis:

<u>Tapið samanlagt: 3.300 mio. kr.</u>

Sjb: 3.300*5/11,5 =	1.435 mio. kr	Føroyskur partur =	1.435 mio. kr.
FB: 3.300*6,5/11,5 =	1.865 mio. kr	Harav DDB (62%) =	1.156 mio. kr

Verður sæð burtur frá, at bankamál er danskt málsøki, skuldi bankabjargingin í mesta lagi kostað føroyska skattgjaldaranum bjargingina av Sjb, sum var 1.435 mio, umfram 38% av missinum uppá FB, ella falt 2.144 mio kr. DDB skuldi so í minsta lagi rindað 1.156 mio. kr, sum er 62% av tapinum í FB. Sum høvuðseigari var tó ikki órímiligt, at DDB bar alt tapið í FB, sum var 1.865 mio kr (undan partabrævaumbýtinum átti DDB heili 82% av partapeninginum í FB).
Men sum kunnugt, smoygdi DDB sær úr bankakreppuni við at gjalda 650 mio. kr, og slapp sostatt undan teimum 1.215 mio. kr, sum ístaðin vóru álagdar føroysku skattgjaldarunum.

Tá bankaviðurskifti eru danskt málsøki, hava røddir verið frammi um, at danski staturin átti at átikið sær at fíggjað alt tapið í bankunum. Tað tykist tó ikki, at hetta eigur nakra undirtøku millum danskar politikarar og embætismenn.

Tað eru allar orsøkir at halda, at DDB longu tíðliga í 1992 hevði ætlanir um at sleppa so bíliga úr Føroyum sum gjørligt. Hesum var løgfrøðiliga sjálvsagt einki skeivt í, men harafturímóti tykist leikluturin hjá Fíggingargrunninum og Fíggjareftirlitinum hava verið sera ivingarsamur í hesum máli.
Stór ónøgd hevur eisini verið millum føroyingar um mannagongdina í loysnini av bankakreppuni. Ikki tí bankaskipanin varð bjargað, men ítn á háttin, hetta er gjørt uppá.
Tað er eisini breið fatan millum manna, at DDB beinleiðis varð hjálptur hiðani við so lítlum tapi sum gjørligt.

Í seinastu frágreiðingini um støðu landsins (Gørtz-rapportin), verður hesin spurningur eisini umrøddur. Hóast avmarkað verður gjørt burtur úr hesum álvarsmáli, slær Gørtz-nevndin tó fast:

".. at der er næppe tvivl om, at DDB tidligere end landsstyret blev opmærksom på, at "alt kunne ske", ... og at det var ønskeligt for DDB at slippe for ansvar i forbindelse med FB's skæbne, ... at Danmark (DDB og Indskydergarantifonden) er sluppet billigt ud af de færøske bankers krise."

Seinastu árini hava sakarmál verið reist móti monnum um ivasamar skipaíløgur, sum hava kostað landskassanum ómetaligar upphæddir. Fyri fáum vikum síðani var alt samfelagið tikið á bóli, tá løgreglan, sum framhald av hesum sakarmálum, fór undir størstu húsarannsakan í Føroya søgu nakrantíð.
Sagt varð, at málið við hesi atsøkn var at fáa til vega neyðug prógv, soleiðis at ákæra kann reisast móti øllum teimum, sum hava staðið fyri skipaíløgunum, sum eru atvoldin til tey ovurhonds tapini, sum øll eru endað í skattarokningini hjá einstaklingunum.
At ákæruvaldið nú hevur tikið stig at kanna allar skipaíløgurnar, har illgruni er um, at ikki alt er farið regluliga fram, er einki at siga til.
Í kjalarvørrinum av øllum tapunum hevur samfelag okkara verið merkt av skuldsetingum, illgitingum og jagstran eftir syndabukkum, og hevur hetta alt eitt makalcyst vónloysi og sundurlyndi í landinum.

Hetta kann bert rættast upp aftur, um endaliga ábyrgdin verður staðfest.

Tá nú stig loksins eru tikin til endaliga uppgerð av fortíðini, er tað so sjálvsagt, at øll ivamál verða kannað.

Tí metir Fólkaflokkurin, at stórsta og mest umfatandi inntrivið í samfelagnum, bankasamanleggingin, eisini skal kannast.
Henda samanlegging, sum hevur reist so mangar ivaspurningar, hevur sátt misálit millum manna. Fyrst og fremst mótvegis teimum, sum hava skipað fyri t.e. serliga Fíggingargrunninum, men eisini móti øllum sum heild.
Donsku fjølmiðlarnir hava eisini válkað sær í kreppuni í Føroyum. Hetta hevur gjørt støðuna hvaðna verri, og er eisini til stóran ampa fyri búskaparligar endurreisingarætlanir.

Tí eigur sum skjótast greiða at fáast á gongdini í bankasamanleggingini.

Alment kom bankakreppan undan kavi 6. oktober 1992.
Men dagarnar frammanundan hevði nógv fundarvirksemi verið millum leiðsluna í Sjóvinubankanum og landsstýrið øðrumegin og Fíggjareftirlitið, Tjóðbankan og donsku stjórnina hinumegin um støðuna hjá Sjóvinnubankanum.

Á einum av hesum fundunum við Bankaeftirlitið, 2. okt 1992, fregnaðust umboðini fyri Sjóvinubankan, hvussu støðan í Føroya Banka var. Svarið, ið sæst í fundarfrásøgnini, sum eisini var góðkend av Eigil Mølgaard, stjóra í Fíggjareftirlitinum, er soljóðandi:

"Der blev oplyst, at gennemgangen af Føroya Banki's engagementer var blevet gennemført og vurderingerne sammenholdt med vurderingerne med P/f Sjóvinnubankin. Men til forskel til Sjóvinnubankin, har Føroya Banki en stærk hovedaktionær, nemlig Den Danske Bank. Eigil Mølgaard oplyste, at han fra Knud Sørensen (forstjóri í DDB) havde fået bekræftet, at Den Danske Bank ville stå ved sine forpligtelser overfor deres datterselskab på Færøerne og tilføre den nødvendige garantikapital og likviditet."

Hetta endaði eisini við, at DDB í des. 92 skeyt inn í FB 138 mio. kr í nýggjum partapeningi og harumframt 200 mio kr. í garantipeningi.

Men í febr. 1993 tykist tað sum DDB er um at fáa kaldar føtur, tá teir í brævi til donsku stjórnina 8. febr. 1993 gera vart við, at 350 mio króna innskotið, sum Sjóvinnubankin tá fær afturat, fer at virka kappingaravlagandi. Hetta vildi DDB ikki góðtaka.
Við síni dyggu vitan um føroyskan búskap og sínum tætta sambandi til Fíggjareftirlitið viðvíkjandi støðuni í Sjb, vistu teir óivað langt frammanundan, at hetta fór at vera neyðugt. Tí ber henda reaktión brá av at vera partur av einum meira langsiktaðum taktikki, tí longu á vári 1992 hevði DDB sett FB undir umsiting.

Vísandi til ummælisskriv frá Búskaparráðnum 16. mars 1993 (sí niðanfyri), hevði DDB stutt eftir árslok 1992/93 sett krav mótvegis Fíggingargrunninum um broytt ognar-

viðurskifti í FB og Sjb. Stutt aftaná samdust DDB og Fíggingargrunnurin um partabrævabýtið í bankunum.
Ikki fyrr enn 9. mars 1993 verður landsstýrið so kunnað um ætlaða partabrævaumbýtið og fær 12. mars 1993 skriv frá Fíggingargrunninum um reorganisering av ognarviðurskiftunum í FB og Sjb, har m.a verður sagt:
"... under møder mellem Finansieringsfonden og DDB, er der opnået enighed om en reorganisering af ejerforholdene i de to banker med henblik på at skabe forudsætninger for en samlet bankmæssig indsats for løsningen af Færøernes strukturproblemer.... aftalen går ud på, at Finansieringsfonden bliver majoritetsaktionær i begge banker, mens DDB vil holde en mindretalspost på 30% i hver bank."

Sostatt varð her lagt upp til partabrævabýti millum FB og Sjb, og vóru hetta ætlanir, sum helst hava verið fyrireikaðar í rúma tíð, uttan at landsstýrið var vitandi um hetta, hóast Fíggingargrunnurin í skrivi í mars 1993 sigur nakað annað.
Gørtz-nevndin sigur m.a. soleiðis um hetta mál:
"..at ved denne aktieombytning slap DDB af med det reelle og alvorlige problem, den havde som majoritetsaktionær."
Sagt varð annars, at ein av fyrintununum við partabrævabýtinum var, at tað gjørdist lættari at fremja neyðugu strukturtillagingina innan fiskivinnuna, høvdu bankarnir sama eigara.

Her varð óivað hugsað um tað, sum seinni varð Føroya Fiskavirking, sum Rich. Mikkelsen í blaðgrein 29.nov 1994 sigur: *"..er en vigtig begrundelse for Landsstyrets tilslutning.."* (til partabrævabýtið).
Fíggingargrunnurin gjørdist nú alt meira sjónligur í hesum máli. Og um miðjan mars 1993 varð lagt upp til monopoliseringina av flakavinnuni umframt eina endaliga fremjan av partabrævaumbýtinum.
Hetta varð alt gjørt, hóast landsstýrið í brævi til donsku stjórnina 30. mars 1993 til donsku stjórnina m.a. skrivar: *"..Landsstyret kann slet ikke godtage de tanker, som Finansieringsfonden har fremlagt om ét produktionsselskab for alle fabrikkerne.... Landsstyret mener, at fondens tanker er i strid med aftalen fra 1. febr. 1993.."*

Búskaparráðið fekk frá landsstýrinum til ummælis skrivið frá 12. mars frá Fíggingargrunninum, um at geva loyvi til partabrævaumbýtið.
16. mars 1993 lýsti Búskaparráðið í skrivi til landsstýrið gongdina í málinum. Har varð m.a. ført fram:
".. at uppskotið er gjørt av Fíggingargrunninum saman við DDB, ... og ymiskt bendir á at danskir myndugleikar vita munandi meira um viðurskifti bankanna enn føroyskir myndugleikar og somuleiðis um framtíðarætlanirnar.
At aftaná semjuna 1. febr. 1993, arbeiddi danska stjórnin við .... partabrævaumbýti millum Fíggingargrunnin og DDB ... at nógv bendir á, at DDB hevur sett krav um broytt ognarviðurskifti áðrenn 30. januar 1993, og at landsstýrið einki veit um hetta, men ábendingar eru um at danska stjórnin er kunnað.... at Fíggingargrunnurin samráðist við DDB um partabrævaumbýti, og at partarnir gera eina semju, sum byggir á eina virðismeting, sum verður gjørd saman við Fíggjareftirlitinum."
Landsstýrið hevði nú bert ein dag at umráða seg í. Støða til semjuna millum Fíggingar-

grunnin og DDB skuldi takast longu dagin eftir, 17. mars 1993.
DDB kravdi eisini svar í stundini. Peter Straarup (stjóri í DDB) hótti við, at um partabrævaumbýtið ikki fekst í lag, so trekti DDB seg úr øllum lániviðurskiftum í Føroyum við serligum atliti til Føroya Fiskasølu.

Annars førdi Búskaparráðið fram í ummælinum av hesum máli:
"*.. Støða Føroya mótvegis DDB er ógreið. Hevur FB fyri neyðini at fáa eina kapitalveiting, og er hetta orsøkin til, at DDB vil selja partabrøvini í FB?*
*....**Fíggingargrunnurin upplýsir einki um, at neyðugt er at veita FB nýggjan kapital**.... Við at góðtaka semjuna, hevur landsstýrið so longu **frammanundan góðtikið eitt tap uppá FB?***
*..Og um nýggjar avsetingar skulu gerast í FB, so hevur **DDB givið skeivar upplýsingar í samráðingunum.**"*

Tað er neyvan neyðugt at minna á, at longu 28. mai 1993 mátti føroyski skattgjaldarin út at læna 560 mio. kr til bankarnar. Aftur 12. okt. 1993 tørvaði samanlagda bankanum heilar 1.300 mio. kr.

Men ikki heri DDB ynskti partabrævabýtið. Eisini Richard Mikkelsen stuðlaði umbýtinum við teirri grundgeving, at tað var neyðugt skuldi DDB framhaldandi stuðla Føroyum við garantium og kreditlines, og at partabrævaumbýtið harumframi var ein treyt fyri at loysa strukturproblemini í Føroyum (stovna Føroya Fiskavirking).
Eisini gjørdi Richard Mikkelsen vart við, at statsministeriið var kunnað um fussiónsætlanina, og har varð tikið undir við ætlanunum. Hetta varð gjørt, áðrenn landsstýrið fekk snevilin av ætlanunum.

Partabrævabýtið varð eisini stuðlað av Fíggjareftirlitinum. Galdandi mannagongd er, at hetta eftirlit skal góðkenna samanlegging av peningastovnum. Endamálið er, at ongin ella hvørgin av pørtunum verður við svidið soð.
Vert er nú aftaná at leggja merki til, at hetta endamálið als ikki er rokkið. Tað kunnu ið hvussu er allar partar vera samdir um.

Á fundinum í Tjóðbankanum 17. mars 1993 millum Landsstýrið, Fíggingargrunnin og Den Danske Bank um ætlaða um partabrævaumýtið, er samb. fundarfrásøgnini:
"*..landsstyrets reaktion meget skeptisk.*"
Landsstýrið setti fram fleiri spurningar, har ímillum: "*..om Føroya Banki har behov for ny kapitaltilførsel?*"
Vegna DDB svaraði Peter Straarup, stjóri: "*..Føroya Banki har ikke behov for mere kapital (under forudsætning af den omtalte nødvendige indsats).*"

Undir hørðum trýsti og við støði í upplýsingunum á hesum fundi, feldir í fundarfrásøgn, tók landsstýrið á fundi 22. mars 1993 endaliga undir við ætlanini um partabrævaumbýtið.
Tað løgna við fundarfrásøgnini, sum varð skrivað 17. mars 1993, og sum legði lunnar undir støðutakan landsstýrisins, er, at hon er broytt í eini "rættaðari" útgávu, har úttalilsini frá P. Straarup um kapitaltørvin í FB er strikað. Henda rættaða frásøgn var

ikki landsstýrinum í hendi fyrr enn miðjan apríl 1993, tvs. 3 - 4 vikur aftaná, at endaliga avgerðin um partabrævaumbýtið var tikin.

Aftan á 22. mars og fram til 28. mai 1993. verður terminologiin viðvíkjandi pengum til bankarnar broytt til innskot "i bankerne" uttan at ásett verður hvussu nógv skal í hvønn banka sær. Men aftaná 22. mars er tað heldur ikki neyðugt at upplýsa, hvør banki skal hava hvat.
Tí eru orsøkir at halda, at tað, sum fór fram til 22. mars 1993, bar brá av "manipulatiónum" við tí endamáli, at DDB skuldi sleppa so bíliga sum gjørligt burturúr sínum engagementum í Føroyum.
At Fíggingargrunnurin og Bankaeftirlitið neyvan hava tent føroysku áhugamálunum nóg væl og syrgt fyri at føroyski skattgjaldarin slapp so bíliga burturúr hesi bankasamanlegging sum gjørligt, er neyvan nakar ívi um.

Bæði Bankaeftirlitið og Fíggingargrunnurin kunnu eisini átalast fyri, at DDB fekk loyvi til, bæði áðrenn og serliga aftaná 22. mars 1993, sjálvur at standa fyri uppruddingararbeiðinum í Føroya Banka, við bæði at stjórna bankanum og manna nevndina. Harumfram varð DDB av Fíggingargrunninum tryggjað umboðan í fleiri øðrum týðandi leiðslustørvum í landinum. Lyklastørv, sum kundu tryggja, at DDB, uttan óneyðuga íblandan, kundi avvikla sínt engagement her.
Eisini er tað átaluvert, at avsetingarnar í báðum bankunum ikki vórðu nágreiniliga kannaðar og umtalaðar í samband við samanleggingina.
Leiðslurin var, at alt skuldi ganga so skjótt fyri seg, at okkara samráðingarmenn ikki høvdu stundir til at hugsa seg um og taka tey neyðugu stigini.
22. mars 1993 var so leiðin ruddað og so gekk skjótt.
Tað er avtalan tann 28. mai 1993 besta váttanin um. Tá varð uttan hóvasták útskrívaður ein blankokekkur til bankarnar, tí nú stóð alt Føroya fólk við endan og ikki sum frammanundan, eisini Den Danske Bank.

Næsta stigið varð tann endaliga samanleggingin á sumri 1993 (formliga 1. januar 1994) og tá hetta var avgreitt, kundi stjórn, ávísir lyklapersónar og teir av DDB útnevndu nevndarlimir, stinga í sekkin og fara av landinum.
Føroya fólk stendur eftir við rokningini, spyrjandi - hvør var leikluturin hjá Fíggjareftirlitinum og Fíggingargrunninum.

Fingu vit allan sannleikan frá hesum stovnum, ella duldu teir nakað fyri okkara samráðingarmonnum.

Fóru ikki fram manipulatiónir fyri at náa endamálinum, sum var at sleppa DDB burturúr Føroyum á bíligasta hátt?

Fyri meir enn ári síðani metti Fólkaflokkurin at kanning av hesum viðurskiftum var neyðug, men hetta fekk tíverri ikki undirtøku í Løgtinginum.
Síðan hevur gongdin víst, at ein slík kanning er neyðug, skal álitið millum føroyingar og danir ikki fara endaliga fyri bakka. Við støði í tí sum farið er fram, er tíverri orsøk at halda,

at spurnartekin kann setast við ta ráðgeving, sum landsstýrið fekk frá Fíggingargrunninum, Fíggjareftirlitinum og Forsætismálaráðnum,

at landsstýrið hevur tikið avgerðina um partabrævabýtið út frá skeivum fortreytum og ikki fingið upplýsingar um meirtørv av peningi til bankarnar,

at tað er sera løgið, at kapitaltørvurin vaks knappliga aftaná, at partabrævabýtið var framt og aftaná at endaliga samanleggingin varð avtalað ella trýst ígjøgnum.

at Den Danske Bank ikki helt tað lyftið um fíggjarligan stuðul til Føroya Banka og til føroyska samfelagið, sum varð okkara samráðingarmonnum kunnað 4. oktober 1992,

at Den Danske Bank villleiddi landsstýrið, tá partabrævabýtið fór fram 22. mars 1993.

Tí verður hetta uppskotið sett fram til samtyktar.

1. viðgerð 19. desember 1994. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 16. januar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Bjarna Djurholm, løgtingsmanni vegna Fólkaflokkin tann 08.12.1994, og eftir 1. viðgerð tann 19.12.1994 beint í Rættarnevndina.

Fyri at útvega eitt so haldgott støði undir sínum tilmæli, sum gjørligt, hevur Rættarnevndin heitt á ávikavist landstýrið, Føroya Banka og Landsbankan, um at senda nevndini allar upplýsingar, sum mugu haldast at hava týdning í málinum, so sum fundarfrágreiðingar, notat, brævaskifti, roknskapir v.m.

Eisini eru skjøl fingin frá Fíggingargrunninum, sum kunnu hava týdning fyri málið.

Landsstýrið hevur útflýggjað nevndini tað tilfar, sum hevur ligið í journalini hesum máli viðvíkjandi, uttan at vissa harvið er fingin fyri at alt tilfarið er fingið til vega. Aftan á at hava ráðført seg við landsstýrið hevur Landsbankin útflýggjað nevndini tað tilfar, ið hann hevur í málinum.

Føroya Banki hevur gjørt vart við, at teir fyribils taka fyrivarni viðv. útflýggjan av slíkum tilfari, tá hetta møguliga kann koma í stríð við lógásettar og innanhýsis reglur um tagnarskyldu v.m.

Rættarnevndin hevur harumframt fingið útflýggjað frágreiðingina frá landsgrann-

skoðaranum viðv. partabrævaumbýtinum dagf. 24.09. 1993 og fundartrágreiðingina frá 4. okt. 1992 millum Fíggjareftirlitið, Sjóvinnubankan og Føroya Landsstýri. Frágreiðingin frá landsgrannskoðaranum er viðløgd sum skjal.

Eftir tilmæli frá landsgrannskoðaranum sendi landsstýrið 4. februar 1994 Fíggjareftirlitinum bræv við spurningum. Tvær vikur seinni skrivaði Fíggjareftirlitið til landsstýrið, at tað fór at koma við einum svari skjótast gjørligt. Í mai 1994 rykti Landsstýrið eftir lovaða svarinum, sum tó ikki er komið enn.

Við støði í fundartrásøgnum, brævaskiftum, notatum og savnaðum upplýsingum annars heldur Rættarnevndin tað vera neyðugt:

a) at staðfesta um landsstýrið í samband við góðkenning av keypinum av Føroya Banka fekk allar neyðugar upplýsingar til tess at meta um avleiðingarnar av hesi avgerð.

b) at staðfesta, um allar upplýsingar, sum landsstýrið fekk, vóru eftirfarandi og álítandi.

c) at gera upp, um landskassin einsamallur eigur at ábyrgjast fyri tapini í Føroya banka, sum nú eru staðfest.

Í frágreiðingini frá landsgrannskoðaranum verður m.a. soleiðis tikið til um hesi viðurskifti:

"Tá landsstýrið bjarguði Sjóvinnubankanum í okt. 1992, legði landsstýrið dent á, at hetta m.a. var gjørt, tí støðan í Sjóvinnubankanum var munandi verri enn í Føroya Banka, sum harumframt hevði ein sterkan høvuðspartaeigara aftan fyri seg, Den Danske Bank, sum samb. Fíggjareftirlitið hevði givið tilsøgn um at standa við sínar skyldur og innskjóta neyðugan kapital og likviditet, og at vandi annars var fyri, at Føroya Banki, um Sjóvinnubankin fór tá, eisini kom í stórar fíggjarligar trupulleikar, og at øll bankaskipanin sostatt fór fyri bakka.

Í samband við keyp av einum banka ella einum og hvørjum øðrum virki, har so stórur upphæddir og eventualskyldur standa upp á spæl, vildi tað verið ein sjálvsøgd skylda hjá tí, ið beinleiðis luttekur í tílíkum samráðingum, í hesum føri Fíggingargrunninum, at kanna og meta sera gjølla um øll virðir og allar hugsandi tapsvandar nógv ár fram, og kunna landsstýrið, ið gjalda skal, um hesi viðurskifti og taka øll neyðug fyrivarni. Men Fíggingargrunnurin tykist ikki at hava lagt dent á hesa uppgávu, og vísti til Fíggjareftirlitið, ið metti, at talan var um ein rímuligan pris, m.a. vísandi til ársroknskapin hjá Føroya Banka fyri 1992.

Landsstýrið hevur eftir øllum at dømi havt álit á hesum upplýsingum og ikki sjálvt tikið stig til løgfrøðiliga at tryggja seg ella Fíggingargrunnin ímóti at koma at hanga upp á so stór tap, sum tað nú sær út til.

Við at lesa tilfarið ígjøgnum fæst eisini ein fatan av, at hvørki Fíggingargrunnurin ella

Fíggjareftirlitið leggja stórvegis dent á, at landskassin nú, eftir øllum at dømna kemur at átaka sær munandi skyldur og tap, sum Den Danske Bank annars í stóran mun óivað hevði komið at drigist við. Fíggjareftirlitið og Fíggingargrunnurin tvkjast at leggja høvuðsdentin á, at samanleggingin av bankunum er liður í eini heildarloysn av strukturtrupulleikunum í føroyska samfelagnum."

Við støði í frágreiðingini hjá Landsgrannskoðaranum, hevur Rættarnevndin raðfest og samskipað tilfarið í tíðarrød, soleiðis at løgtingið kann fáa eitt so haldgott og fullfíggjað innlit um gongdina í hesum máli sum yvirhøvur gjørligt.

Í tráð við henda málsetning verða niðanfyri endurgivin brot úr øllum tøkum skjalatilfari, sum fyribils mugu haldast hava týdning fyri málið.

Eitt skriv frá Den Danske Bank til forsætismálaráðið dagf 8. febr. 1993, er fyrsta tøkiliga stigið í royndunum hjá móðurbankanum at umskipa eigaraviðurskiftini í Føroya Banka við tí í hyggju at sleppa sær undan sínum skyldum mótvegis dótturbankanum í Føroyum.

Í innganginum til skrivið verður víst á teir bygnaðartrupulleikar, sum eru í føroyska samfelagnum, og neyðugu tillagingina til broyttu búskaparligu fyritreytirnar.

Í framhaldi av hesum heldur drúgvu inngangsorðum, verður síðan komið til sjálva kjarnina í málinum á seinastu síðu í skrivinum, har hetta verður borið soleiðis upp á mál:

"Der er som nævnt behov for en tilpasning af kapaciteten til de økonomiske forhold på Færøerne. I denne forbindelse bør der peges på, at også den financielle sektor med betydelig fordel kunne gennemgå en rationaliserende tilpasning. ***Det kan ikke afvises, at en eventuel fusion af Føroya Banki og Sjóvinnubankin kunne være et særdeles nyttigt skridt i forbindelse med en samlet løsning af den færøske situation.***

Vi tillader os at fremdrage det anførte over for statsministeriet, idet det er vor opfattelse, at der - i hvert fald fremover - principielt bør være balance mellem midler, der fra offentlig side tilføres henholdsvis Sjóvinnubankin (og andre pengeinstitutter) samt Føroya Banki. Dette vil også være i overenstemmelse med formålsbestemmelsen i Finansieringsfonden af 1992's vedtægter.

På denne baggrund vil vi sætte pris på, om et møde kunne bringes i stand mellem statsministeriet og vor bank med henblik på at drøfte, hvorledes strukturtilpasningen kan gennemføres mest afbalanceret, samt hvorledes anvendelsen af statslige midler kan foretages retfærdigt og optimalt. ***I denne forbindelse er Den Danske Bank tillige rede til med Statsministeriet at drøfte den fremtidige ejerstruktur af Føroya Banki."***

Eintak av nevnda skrivi var sent ávikavist Jan Trøjborg, ídnaðarmálaráðharra, Eigil Mølgaard, stjóra á fíggjareftirlitinum og Richard Mikkelsen, stjóra í Fíggingargrunninum.

Í framhaldi av samrøðu við landsstýrið tann 9. mars 1993, verður samb. skriv dagf. 12. mars 1993 frá Fíggingargrunninum til Føroya Landsstýri lagt fram uppskot um umskipan av eigaraviðuskiftunum í ávikavist Føroya Banka og Sjóvinnubankanum.

Brot úr hesum uppskoti, sum hava týðning fyri støðutøkuna til hetta mál, skulu verða endurgivin, sum niðanfyri tilskilað.

"Under møder mellem Financieringsfonden af 1992, der er majoritetsaktionær i Sjóvinnubankin, og Den Danske Bank, der er majoritetsaktionær i Føroya Banki, er der opnået enighed om en reorganisering af ejerforholdene i de to banker med henblik på at skabe forudsætninger for en samlet banknæssig indsats for løsningen af Færøernes strukturproblemer m.v.

Aftalen er kommet i stand under medvirken af finanstilsynet, og som kræver godkendelse af den danske regering og det færøske landsstyre, går i hovedtræk ud på, at Financieringsfonden af 1993 bliver majoritetsaktionær i begge banker, men Den Danske Bank vil holde en mindretalspost på 30% i hver bank....."

"Egenkapitalen i Føroya banki kan på grundlag af årsregnskabet i 1992 opgøres til kr. 236.225.000. Aktiekapitalen andrager kr. 151.250.000, hvilket giver en indre værdi af aktierne på 156. Af aktiekapitalen ejer Den Danske Bank 123.707.000 aktier svarende til 82% af kapitalen.

Egenkapitalen i Sjóvinnubankin kan på grundlag af årsregnskabet 1992, reguleret for aktiekapitaltilførslen på kr. 200 mio. fra Financieringsfonden af 1992 i marts 1993, opgøres til kr. 247.400.000. Aktiekapitalen andrager kr. 250.000.000, hvilket giver en indre værdi af aktierne på 99. Af aktiekapitalen ejer Financieringsfonden kr. 235.000.000 aktier svarende til 94% af kapitalen....."

"Herefter overdrager Den Danske Bank nominelt kr. 78.332.700 aktier, d.v.s. 52% af den samlede kapital i Føroya banki for en pris af kr. 122.340.000 (svarende til en indre værdi 156) til Financieringsfonden af 1992 mod som vederlag at modtage nominelt kr. 75.000.000 aktier i Sjóvinnubankin, svarende til 30% af den samlede aktiekapital, til en værdi, baseret på den foran anførte indre værdi af aktierne på 159, af kr. 119.220.000....."

Somuleiðis skulu verða endurgivin brot úr tilmælinum frá Búskaparáðnum dagf. 16. mars 1993.

Her verða tikin fleiri fyrivarni, samstundis sum settir verða føkiligir spurningar viðv. teimum upplýsingum, ið komnir eru fram um fortreytirnar fyri ætlaða partabrævaumbýtinum:

"Aftan á semjuna 1. febr. 1993 kom fram, at danska stjórnin hevur arbeitt við a) avtøkufelagið fyri vánaligum aktivum hjá Sjóvinnubankanum og Føroya Banka, b)

partabrævaumbýtið millum Fíggingargrunnin og Den Danske Bank, og c) fusión millum bankarnar.

Hevur Den Danske Bank sett fram krav um partabrævaumbýti?
Hava teir verið við ella kent til viðgerðina av Sjóvinnubankanum?

Nógv hendir á, at Den Danske Bank hevur sett fram krav ella ynski um broytt ognarviðurskifti áðrenn 30. januar 1993....."!

"Fíggjarmálaráðharrin sigur løgmanni (15. mars 1993) at bert fáir dagar (1 - 2) eru til at taka støðu til góðkenningina, tí Den Danske Bank krevur eitt svar....."

"Støðan mótvegis Danske Bank er ógreið. Hevur Føroya Banki fyri neyðini at fáa eina kapitalveiting, og er hetta orsøkin til at teir vilja selja partabrøvini í Føroya Banka fyri ikki at hava nakra ábyrgd at veita Føroya Banka nýggjan kapital?

Í skrivinum frá Fíggingargrunninum fyri 1993 verður sagt frá, at aktivini hjá Føroya Banka skulu metast 150 mió. kr. lægri, um tey verða gjørd upp á sama hátt sum tey í Sjóvinnubankanum. Hóast hetta, so stendur einki í skrivinum um, at neyðugt er at veita Føroya banka nýggjan kapital.

Við at góðtaka semjuna, hevur landsstýrið so longu frammanundan góðtikið eitt tap uppá Føroya Banka?

Um nýggjar avseringar skulu gerast í Føroya banka, so hevur Den Danske Bank givið ***skeivar upplýsingar*** *í samráðingunum. Av tí at Fíggingargrunnurin ikki upplýsir um hetta, eigur landsstýrið at fáa svar uppá spurningin við at venda sær til Den Danske Bank.*

Sambært Finanstilsynet verður virðið av Sjóvinnubankanum hækkað við 150 mió. kr., tí at hann hevur fingið tilført meira av nýggjum kapitali enn Føroya Banki.

Nær kendi danska stjórnin til støðuna hjá Den Danske Bank um nýggjan partapening....."?

Í niðurstøðuni verður sagt: *"Ógreiðan mótvegis Danske Bank, um tørvur er á nýggjum kapitali, verður best svarað av Danske Bank."*

Hóast Búskaparráðið í sínum tilmæli er sera ivasamt, so verður niðurstøðan tó henda:

"Mælt verður landsstýrinum til at góðkenna partabrævaumbýtið uttan mun til um Føroya Banki hevur tørv á at fáa eina kapitalveiting."

Hetta seinasta tilmælið uttan nakra ítøkiliga grundgeving kann tykjast heldur løgið, tá óvissan um fortreytirnar fyri partabrævaumbýtinum sum kunnugt var rættiliga stór!

Avgerandi týðning fyri støðutøku landsstýrisins um at góðtaka partabrævaumbýtið vóru tær upplýsingar, sum koma fram á fundi í Danska Tjóðbankanum tann 17.03.1993 millum ávikavist Føroya Landsstýri, Fíggingargrunnin og Den Danske Bank.

Hesi brot úr fundarfrágreiðingini skulu verða tikin fram:

Her ger løgmaður vart við: *"At landsstyret føler sig underinformeret, forstået på den måde, at andre parter i forløbet, d.v.s. den danske regering, Financieringsfonden og Den Danske Bank, har været bedre informeret.*

Den afgørende begrundelse for beslutningerne den 6. okt. 1992 og 1. febr. 1993 var ønsket om at sikre det færøske banksystem, idet man var overbevist om, at hvis den ene bank gik ned, så blev den anden også revet med. Hvilket ville betyde, at et meget vigtigt fundament i den færøske økonomis fremtid ville være ødelagt.

En anden meget vigtig begrundelse var, at Sjóvinnubankin ikke, som Føroya Banki, havde en stærk organisation i ryggen. Hvilket man troede var en fællesbegrundelse for regeringen og landsstyret....."

Løgmaður setti síðan nakrar ítøkiligar spurningar viðv. grundarlagnum fyri einum møguligum partabrævaumbýti, og vóru hesir m.a. soljóðandi:

1) "Forslaget fra Financieringsfonden og Den Danske Bank om aktieombytning baseres på en opgørelse og vurdering af den indre værdi af aktierne i Sjóvinnubankin og Føroya Banka. Vurderingen includerer i Sjóvinnubankans favør et tillæg på 510 mill. kr. ***Har Føroya Banki behov for ny kapitaltilførsel?*** *Accepterer landstyret ved godkendelse af forslaget på forhånd et tab på 150 mill. kr.? Er der behov for yderligere hensættelser på erhvervs og boligudlån?*

2) Hvornår har den Danske Bank givet udtryk for sit ønske om reorganisering af ejerforholdene i de to banker?"

Svarið frá Peter Straarup stjóra í Den Danske Bank var samb. **almennu** fundarfrágreiðingina dagf. 14 apríl 1993, t.v.s ca. 3 vikur eftir partabrævaumbýtið soljóðandi:

1) "Der er ikke tale om, at værdier i Sjóvinnubankin, herunder heller ikke de indskudte 850 mio., efter forslaget overføres til Føroya Banki. I byttehandelen er der taget fuldt hensyn til værdien af Sjóvinnubanka aktierne, som er købt med et tillæg på kr. 45 mio. i forhold til de regnskabsmæssige værdier. Føroya Banki har i de senere år ikke haft den samme kreditudvidelse som Sjóvinnubankin. Den har tidligere og i større omfang foretaget egentlige afskrivninger. Bankens hensættelser i fiskerierhvervet er efter Den Danske Banks opfattelse ikke mere optimistiske end Sjóvinnubankan's. Finanstilsynet havde gennemgået de to banker og udtalt, at hvis der ikke skete en koordineret indsats, ville begge banker få problemer. For så vidt angår tidspunktet for disse problemers opståen, ville det være et spørgsmål om forskelle i timer. Derfor var den Danske Bank bibragt den opfattelse, at de to bankers forhold var omtrent paralelle. Banken havde dog

ikke indsigt i Sjóvinnubankan. Udviklingen ville naturligvis påvirke bankernes situation. Såfremt fangsterne også i indeværende år falder med 1/3, vil der naturligvis opstå problemer. Uanset situationen ville den foreslåede koordinerede indsats forbedre den økonomiske situation. De to banker må konkluderes at være i en meget ens situation med hensyn til hensættelser.

2) banken har skrevet til staten 8. febr., hvor ønsket om en reorganisering af ejerforholdet er meddelt."

Samb. upprunaligu fundarfrásøgnina frá fundinum 17.03. 1993, sum var støðið undir partabrævabýtinum tann 22.03. 1993, og sum Rættarnevndin hevur fingið hendur á, og sum ongantíð kom aiment fram, var svarið frá Peter Straarup soljóðandi:

1) "Ved aktieombytningen er Den Danske Bank overbevist om at afgive en højere værdi, end den modtager. Føroya Banki har i de senere år ikke haft de samme kreditudvidelser som Sjóvinnubankin. Den har tidligere og i større omfang foretaget egentlige afskrivninger. Bankens hensættelser i fiskerierhvervet er ikke mere optimistiske end Sjóvinnubankan´s. ***Føroya Banki har ikke behov for mere kapital.*** *(under forudsætning af den omtalte nødvendige indsats). De to banker er i en meget ens situation med hensættelser."*

Samb. skriv dagf. 22. mars 1993 frá Føroya Landsstýri til Fíggingargrunnin frá 1992 verður endaliga tilsøgnin givin um, at uppskotið til sáttmála um partabrævaumbýtið verður góðkent.

Her stendur m.a.: *"Landstyret har på et møde i dag vedtaget at godkende aftaleudkastet på betingelse af, at fonden senest før aftalens underskrivelse på det kommende møde, giver landstyret sikkerhed for fortsat garanti for udlandslån og kreditlines fra Den Danske Bank til de to færøske banker, som landstyret kan godkende."*

Gongdin í bankamálinum eftir sjálva samanleggingina, kann í stuttum lýsast við hesum brotum úr fyriliggjandi tilfari og frágreiðingum:

Samb. avtalu millum Føroya Landsstýri og Ríkisstýrið frá 28 mai 1993, var staðfestur ein kapitaltørvur til **bankarnar** uttan specifikation uppá ca. 500 - 600 mill kr.

Samb. skriv dagf. 10. aug. 1993 frá Fíggingargrunninum til Føroya Landsstýri verður greitt frá tí sera vánaligu fíggjarliga úrslitinum í bankunum fyrra helming av 1993, og ætlanunum um at leggja bankarnar saman á einum komandi eykaaðalfundi.

Her verður m.a. greitt soleiðis frá: *"Ved regnskabsaflæggelsen pr. 30 juni 1993 har de to færøske banker måttet foretage så store hensættelser, at begge banker ikke længere opfylder solvensbestemmelserne i den nye banklovs paragraf 21...."*

"Føroya banki forventes at foretage henlæggelser på ca 750 mill kr., hvorved der fremkommer et underskud for halvåret som helhed på omkring 650 mill. kr., medens

henlæggelserne i Sjóvinnubankin har udgjort 340 mill. kr. med et underskud på 262 mill. kr. til følge...."

"Som følge heraf er hele egenkapitalen i Føroya Banki tabt, medens det i Sjóvinnubankin hovedsagelig er aktiekapitalen, der må afskrives...."

"På baggrund af udviklingen har bankernes bestyrelse overvejet en fusion af de to banker for at udnytte de fordele, bl.a. af omkostningsmæssig art, der vil blive forbundet hermed...."

"Det andet spørgsmål har relation til aktiebyttet i marts 1993 mellem Financieringsfonden og Den Danske Bank. Ved denne lejlighed blev Fonden majoritetsejer i begge banker. Som nævnt er hensættelsesbehovet i Føroya Banki dobbelt så stort som i Sjóvinnubankin, og man kan derfor stille det spørgsmål, om ikke ombytningsforholdet burde være et andet end det, der rent faktisk blev anvendt, nemlig stort set 1 SB aktie for 1 FB aktie.

Dette kan man have mange meninger om, men besvarelsen af spørgsmålet er ikke videre interessant, eftersom aktiekapitalen i begge banker er tabt, og aktiehandlen ikke i nævneværdig grad gav anledning til kontante afregninger.

Mere væsentligt er det, at havde aktiehandlen ikke fundet sted, ville Financieringfonden alene være forpligtet over for Sjóvinnubankin, således at yderligere kapital, der skulle til, ville være væsentligt mindre end det kapitalbehov, der nu foreligger.

Dette er ubestrideligt, men må ses på baggrund af, at Den Danske Bank ved flere lejligheder i foråret 1993 gav udtryk for, at man ville trække sig ud af engagementer på Færøerne, såfremt aktiebyttet ikke blev gennemført...."

Í skrivi frá 13. aug. 1993 frá Føroya landsstýri til Fíggingargrunnin, verður aftur nortið við spurningin um partabrævabýtið.

Her verður spurningurin soleiðis umrøddur: *"I skrivelsen omtales som et af de store spørgsmål aktiebyttet i marts 1993 mellem Fíggingargrunnurin frá 1992 og Den Danske Bank. Det afvises ikke, at havde man ikke foretaget aktiebyttet, kunne dette have forårsaget store problemer i den færøske økonomi.*

Landstyret ønsker dog at få diskuteret dette spørgsmål yderligere, især ønsker vi at få belyst, om Føroya Banki's økonomiske situation allerede på daværende tidspunkt kunne have givet anledning til, at ombytningen skete til et andet forhold end et til et, samt hvilken betydning et andet bytningsforhold ville have i nuværende situation...."

Í skrivi dagf. 16. aug. 1993 frá Fíggingargrunninum til Føroya Landsstýri verður svarað soleiðis uppá omanfyri umrødda spurning:

"Angående aktiebyttet mellem Den Danske Bank og Fonden tog Den Danske Bank

*udgangspunkt i, at Føroya Banki's aktier - i kraft af bankens reserver - beregningsmæssigt havde en højere indre værdi end aktierne i Sjóvinnubankin. Under drøftelserne kunne Fonden, **med bistand fra Finanstilsynet**, henvise til, at dette forhold blev opvejet af forholdsvis større hensættelser - set over en årrække - i SB end i FB, hvorefter man nåede frem til omveksling af stort set 1 SB aktie med 1 FB aktie. Da aktiekapitalen nu er tabt i begge banker ville et andet ombytningsforhold ikke have ændret resultatet."*

Samb. notat til fundin við Fíggingargrunnin tann 18. aug. 1993, ger landsstýrið hesar viðmerkingar til partabrævaumbýtið:

"Som helhed er det vanskeligt for landsstyret at forstå, at man i Føroya Banka nu pludselig har en viden, der medfører usædvanlig store hensættelser, som man ikke havde på det tidspunkt, da Financieringsfonden overtog aktiemajoriteten i banken...."

Samb. frásøgn frá fundi tann 18. aug. 1993 millum landsstýrið og Fíggingargrunnin frá 1992, hevði Richard Mikkelsen hesar viðmerkingar til partabrævabýtið í lutfallinum 1 : 1.

*""**Man har dengang byttet nogle aktier, der er nul værd"**. Den Danske Bank vildi hava meira fyri partabrøvini í Føroya Banka, men Fíggingargrannurin kannaði roknskapirnar tey seinastu 5 árini, og tað vísti seg, at "i de 5 år var hensættelserne relativt større i Sjóvinnubankanum.*

*Marita Petersen, løgmaður, spurdi: **"Har vi købt katten i sækken?"***

Richard Mikkelsen svaraði:"Selv synes jeg det ikke. Det var den beregning, man kom til. Uden hensyn til aktierne, ville resultatet blive det samme".

Finnbogi Ísakson spurdi, um Den Danske Bank hevði latið Fíggingargrunninum meirilutan av partabrøvunum "for at redde sit eget skind".

*Richard Mikkelsen svaraði: **"Det kan jeg ikke udelukke"."***

Landsstýrið góðkendi á fundi tann 18. aug. kl. 23.15, at bankarnir vórðu lagdir saman.

Í frágreiðingini frá landsgrannskoðaranum dagf. 24.09. 1993 verður gjørd ein roynd at meta um fíggjarligu fortreytirnar fyri samanleggingini við at gera ávísar samanberingar av roknskapunum hjá Sjóvinnubankanum og Føroya Banka fyri árini 1988 - 1992.

Á s. 5. í frágreiðingini stendur m.a.: *"Á viðlagda yvirliti (skjal 1) sæst at gongdin í báðum bankunum viðvíkjandi útlánum, ábyrgdum, avskrivingum og burturleggingum hevur verið sera meinlik, burtursæð frá 1992.*

Lutfallið ímillum bankarnar er at kalla eins øll árini. Tølini í Føroya Banka eru umleið

ein triðing størri enn í Sjóvinnubankanum, og burturleggingar og avskrivingar fylgja á leið hesum lutfalli, burtursað frá 1992.

Um tað í roknskapinum fyri Føroya Banka fyri 1992 vóru gjørdar lutfalsliga somu burturleggingar og avskrivingar sum í Sjóvinnubankanum, skuldu hesar verið umleið 550 mió. kr. størri ella umleið tað dupulta."

Endaliga uppgerðin av útreiðslunum og samlaða kostnaðinum av bankabjargingunum eftir samanleggingina í 1993 er nærri tilskilað í skrivi dagf. 28. okt. 1993 frá Fíggingargrunninum til Føroya Landsstýri.

Brotið í skrivinum hesum viðvíkjandi er soljóðandi:

***"Underskuddet i Føroya Banki er ved regnskabsaflæggelsen pr. 30 september 1993 opgjort til 1.448,7 mill kr. og Sjóvinnubankin til 958,7 mill. kr. Egenkapitalen i de to banker på henholdsvis 436,2 mill. kr. og 397,4 mill. kr., d.v.s. ialt 833,6 mill. kr. er herefter tabt. Kapitalforholdene i bankerne og fordelingen af tabene fremgår af bilag 1. Det vil bemærkes, at i modsætning til tidligere betragtes også den resterende private aktiekapital som tabt.*

Ved at fordele rådighedsbeløbet på 1.860 mill kr. med 1.185 mill. kr. til Føroya Banki og 675 mill kr. til Sjóvinnubankin vil begge banker opfylde bankernes mindstekrav til soliditeten med en - lille - margen som stødpude, jfr ligeledes bilag 1."

Viðmerkjast skal, at feitskriftina í endurgevingunum frammanfyri hevur Rættarnevndin gjørt.

Viðurskifti, sum Rættarnevndin leggur alstóran dent á verða kannað nærri, eru:

1) Leiklutur og ábyrgd hjá Fíggjareftirlitinum í samband bjargingina av teimum føroysku bankunum og ávirkan tess á partabrævaumbýtið tann 22. mars 1993.

Í hesum viðfangi eigur at verða lagdur dentur á hesi viðurskifti:

Lungu á fundinum tann 2. okt. 1992 verður staðfest av Fíggjareftirlitinum, at tørvurin á avsetingum og nýggjum kapitali og likviditeti í Sjóvinnubankanum fer at vera munandi størri enn tær kravdu 500 mill kr.

Fíggjareftirlitið váttar enntá á fundi tann 4. okt. 1992, at veruligi tørvurin á nýggjum kapitali fer at vera 1,5 milliard í Sjóvinnubankanum og ikki 500 mill. kr.

Tá bankarnir í øllum lutum eru sera meinlíkir, er rættiliga nærliggjandi at halda, at um somu metingar vóru gjørdar og somu krøv sett til Føroya Banka sum til Sjóvinnubankan, so hevði Føroya Banki um hetta mundið í veruleikanum mist alla sína eginogn og var farin á húsagang.

Haldgóð grund er tí til at seta fram spurningin um hvør orsøkin er til at annar framferðarháttur var nýttur í samband við virðissetingina av avsetingum og burturleggingum í Føroya Banka enn í Sjóvinnubankanum longu á heysti í 1992, serstakliga við atliti til tað sum landsgrannskoðarin førir fram um, at roknskapirnir eru so at siga "paralellir" við undantak av 1992.

Landsgrannskoðarin førir nevniliga fram, at vóru somu meginreglur fyri avsetingar og burturleggingar nýttar í báðum bankunum fyri 1992, so hevði tørvurin á avsetingum í Føroya Banka verið 550 mill. kr. størri. Samb. roknskapin hjá Sjóvinnubankanum pr. ultimo 1992 eru tapsavsetingarnar 31,6 % av samlaðu útlánunum, meðan avsetingarnar í Føroya Banka bert eru umleið helvtin.

Um so er, at orsøkin til nevnda frávik í metingarhátti er, at Den Danska Bank óformliga stendur sum ábyrgdari, er tað av alstórum týdningi at fáa eina nærri frágreiðing um hesi viðurskifti, og um Fíggjareftirlitið samb. lógini hevur heimild til at víkja frá galdandi meginreglum um virðissetingar, bert tí talan er um, at ein størri banki er meirilutapartaeigari í viðkomandi banka.

Eigil Mølgaard, stjóri í Fíggjareftirlitinum, hevur samb. fundarfrásøgn 2. okt. 1992 boðað frá, at Knud Sørensen vegna Den Danske Bank hevur givið eina tilsøgn um, at bankin vildi standa við sínar skyldur mótvegis Føroya Banka og í hesum sambandi veita neyðugan kapital og likviditet.

Henda avtala er ongantið formliga váttað av Den Danske Bank, og vísir seg seinni als ikki at halda, tá bankin hótti við at taka seg úr Føroyum, um ikki partabrævaumbýtið fekst í lag.

Hóast hetta, so var nevnda tilsøgn ein rættuliga avgerandi fortreyt fyri avgerð landsstýrisins um at bjarga Sjóvinnubankanum tann 6. okt. 1992 við nýggjum kapitali uppá 500 mill kr.

Nærliggjandi er tí at fáa svar uppá spurningin um, á hvønn hátt nevnda tilsøgn var givin, og um Fíggjareftirlitið hevur rætt til at nýta eitt slíkt óformligt lyfti sum eina haldgóða trygd undir Føroya Banka, og harvið sum ein týðandi prógvgrund undir samráðingunum um at endurreisa Sjóvinnubankan.

Tað sæst greitt av frammanfyri umrødda brævaskifti og frágreiðingum, at Fíggjareftirlitið í framhaldi av bjargingini av Sjóvinnubankanum tann 6. okt. 1992 og 1. febr. 1993 hevur luttikið í og havt eina rættiliga avgerandi ávirkan á tað partabrævaumbýtið, sum fór fram tann 22. mars 1993.

Tað hevur tískil týdning á fáa at vita nær og hvussu henda ætlan upprunaliga kom fram? Hvørji stig og av hvørjum, vórðu tikin til tess at fáa ætlanina framda í verki? Eina útgreining av grundgevingum Fíggjareftirlitisins fyri at mæla til hesa loysn. Orsøkina til, at Landsstýrið ikki var kunnað um ætlanina fyrr enn 9. mars 1993, og hví málið tá knappliga hevði so ovurstóran skund. Eina dygga og sakliga grundgeving fyri, at

partabrævaumbýtið fór fram í lutfallinum 1 : 1, hóast Føroya Banki í 1992 átti at sett 550 mió.kr. meira av, um avsett varð í sama mun sum í Sjóvinnubankanum.

2) Leiklutur og ábyrgd hjá Fíggingargrunninum í samband við partabrævaumbýtið tann 22. mars 1993.

Í hesum viðfangi eigur at verða lagdur dentur á hesi viðurskifti:

Samb. danskar fjølmiðlar hevur fundur verið um hesi viðurskifti tann 25. febr. 1993, har umboð fyri fleiri ráðharrastovur vóru møtt, umframt umboð fyri Tjóðbankan, Fíggjareftirlitið, Fíggingargrunnin og Ráðgevandi Nevndina fyri Føroyar

Tá grunnurin heilt eyðsæð skal røkja føroysk áhugamál hevur tað týdning at fáa at vita, hví Fíggingargrunnurin ikki kunnaði Landsstýri um ætlaða partabrævaumbýtið fyrr enn tann 9. mars 1993, tá fyrireikingarnar vóru komnar rættiliga væl áleiðis.

Sonu spurningar kunnu setast grunninum viðvíkjandi lutfallinum millum burturleggingar og avskrivingar hjá Sjóvinnubankanum og Føroya Banka, og hví Fíggingargrunnurin á hesum grundarlag og uttan at kanna hesi ivasomu viðurskiftini nærri, viðmælti uppskotinum um partabrævaumbýtið.

Hisini er tað umráðandi at fáa eina nærri útgreining av útsøgnini hjá Richard Mikkelsen um, at umbýttu partabrøvini í veruleikanum vóru 0-verd, og at man ikki kundi útihýsa møguleikanum fyri, at Den Danske Bank hevði tikið stig til partabrævabýtið fyri at bjarga sínum egna skinni.

Er hetta ein staðfesting av at skeivar og villeiðandi upplýsingar vórðu givnar føroysku myndugleikunum undan partabrævabýtinum?

Áhugavert hevði somuleiðis verið at fingið at vita hvat liggur í útsøgnini frá Richard Mikkelsen um, at virðið á partabrøvunum í veruleikanum ongan týdning hevði, tá báðir bankarnir seinni kortini fóru á húsagang.

Tað avgerandi er, um føroysku myndugleikarnar í nóg góðan mun vóru kunnaðir, um Føroya Banki var solventur ella insolventur við øllum teimum fíggjarligu avleiðingum, sum hetta ber í sær.

Tá Richard Mikkelsen seinni eisini viðgongur, at hann ikki kann útihýsa møguleikanum fyri, at Den Danske Bank bjargar sær burturúr eini fíggjarligari trongstøðu, so má eisini fáast greitt at vita frá Richard Mikkelsen, um hetta ikki er ein ásannan av tí óskrivaðu meginreglu í fíggjarheiminum, at ein móðurbanki altíð stendur við sínar skyldur mótvegis einum dótturbanka, og at tað harvið ikki hevði verið neyðugt hjá Føroya Landsstýri at gingið við til partabrævaumbýtið frá 22. mars 1993 fyri at varðveita eina trygga og forsvarliga bankaskipan í Føroyum.

Eisini eigur spurningurin at verða svaraður, hví Fíggingargrunnurin loyvdi, at Den Danske Bank framhaldandi mannaði bæði nevnd og stjórn umframt onnur lyklastørv í Føroya Banka eftir nevnda partabrævaumbýtið tann 22. mars 1993.

3) Leiklutur og ábyrgd hjá Forsætismálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum og Ídnaðarmálaráðnum í samband við partabrævaumbýtið tann 22. . mars 1993.

Í hesum viðfangi eigur at verða lagdur dentur á hesi viðurskifti:

Stigið til samanleggingina av føroysku bankunum kemur eftir øllum at døma frá Den Danske Bank samb. skriv dagf. 8. febr. 1993, sum er sent beinleiðis til forsætismálaráðið við avriti til Ídnaðarmálaráðharran Jan Trøjborg.

Tað skilst, at umboð fyri ymiskar ráðharrastovur longu tann 25. febr. 1993 hava tikið upp samráðingar við Den Danske Bank, Fíggjareftirlitið, Tjóðbankan, formenninar fyri Ráðgevandi Nevndini og Fíggingargrunnin um nevndu viðurskifti.

Tað hevur tískil týdning at fáa greiðu á spurninginum um, hví donsku ráðharrastovurnar ikki kunnaðu Føroya Landsstýri um hesar ætlanir, umframt at tað hevur týdning at fáa at vita hvønn leiklut hesi umboð høvdu í hesum samráðingum.

Eisini skal fáast svar uppá hvør orsøkin er til at donsku myndugleikarnir viðmæltu hesi samanlegging á einum so spinklum og ófullfíggjaðum grundarlagi, sum tað í hesum førum eftir øllum at døma hevur verið talan um.

4) Leiklutur og ábyrgd hjá grannskoðanini í Føroya Banka í samband við partabrævaumbýtið tann 22. mars 1993.

Í hesum viðfangi eigur at verða lagdur dentur á hesi viðurskifti:
Vantandi hurturleggingar og avskrivingar í roknskapinum hjá Føroya Banka fyri árið 1992 í mun til Sjóvinnubankan.

Herundir eigur at verða lagdur dentur á, at einki fyrivarni er tikið mótvegis teimum ovurstóru tapsvandum, sum lógu fyri framman, og at eingin ávaring um stóru fíggjarligu vandamálini varð givin, tá partabrævaumbýtið fór fram tann 22. mars 1993.

5) Leiklutur og ábyrgd hjá Den Danske Bank í samband við partabrævaumbýtið tann 22. mars 1993.

Í hesum viðfangi eigur at verða lagdur dentur á hesi viðurskifti:

Hevur Den Danske Bank givið Fíggjareftirlitinum eitt endaligt og bindandi lyfti um at bankin vildi standa við sínar skyldur mótvegis dótturbankanum Føroya Banki, so sum

tilskilað í fundarfrágreiðingini frá 2. okt. 1992? Nær, hvussu og fyri hvørjum er hetta lyfti evt. givið?
Hví var hetta ongantíð alment kunngjørt, so sum upprunaliga fráboðað? Hví var tíðindaskrivið um støðuna í Føroya Banka ikki sent 6.10 1992 kl. 10 føroyska tíð, so sum avtalað?

Hvør var orsøkin til, at Den Danske Bank tók stig til samanleggingina, og nær varð hetta stig tikið?

Hví kunnar Den Danske Bank ikki landsstýrið um ætlaðu samanleggingina?

Den Danske Bank hevur sum høvuðspartaeigari fullliggjað innlit í roknskaparviðurskiftini hjá Føroya Banka. Hvør er orsøkin til vantandi burturleggingarnar og avskrivingar í 1992. Hevði Den Danske Bank beinleiðis ávirkan á hesa roknskaparførslu?

Hvør er orsøkin til, at ikki fleiri avsetingar vóru gjørdar í Føroya Banka fram til partabrævabýtið í 1993, tá tað frammanundan, t.v.s í febr. var staðfest, at Sjóvinnubankanum tørvaði eitt eyka kapitalinnskot uppá 350 mill kr. fyri at kunna halda fram, samstundis sum tað bert fáar mánaðir aftaná var tørvur á eykakapitali í Føroya Banka uppá omanfyri 1/2 milliard?

Tá Peter Straarup á fundi tann 17. mars 1993 vegna Den Danske Bank svarar, at Føroya Banki er solventur, hevði verið áhugavert at fingið at vita, hvørjar fortreytirnar eru fyri hesi niðurstøðu?

Hví biður DDB 25.03.93 gjøgnum Fíggingargrunnin í skrivi til Landsbankan, at pkt. 3.2.2 í fundarfrásøgnini frá fundinum 17.03.93 millum Føroya Landsstýri, Fíggingargrunnin og DDB, verður broytt?

6) Leiklutur og ábyrgd hjá nevnd og stjórn í ávikavist Føroya Banka og Sjóvinnubankanum í samband við partabrævaumbýtið tann 22. mars 1993.

Í hesum viðfangi eigur at verða lagdur dentur á hesi viðurskifti:

Røkti leiðslan í bankanum sína uppgávu á forsvarligan og fulltryggan hátt. Hvør var orsøkin til, at ongar ávaringar vóru givnar av leiðsluni í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum undan partabrævaumbýtinum og hví var leiðslan ikki varug við vandamiklu støðuna?

Á frammanfyri nevnda grundarlag mælir **ein samd Rættarnevnd** løgtinginum til ístaðin fyri uppskot Fólkafloksins at seta ein kanningarrætt (dómarakanning) at viðgera málið.

Orsøkin til, at nevndin skjýtur upp at seta ein kanningarrætt er, at við hesum verður lættari at fáa atgongd til upplýsingar í málinum, og harumfram vil Rættarnevndin eisini tryggja sær, at endamálið við kanningini verður rokkið. Í hesum sambandi skal

viðmerkjast, at persónar, ið verða avhoyrdir av kanningarrættinum, hava skyldu at úttala seg, og at hesir tosa undir revsiábyrgd sambært reglunum í revsilógini.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at heita á ríkisstjórnina um samb. grein 21 a í rættargangslógini at seta ein kanningarrætt við hesum kommisorium:

Kanningarrætturin skal kanna og greiða gongdina viðv. partabrævaumbýtinum í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum 22. mars 1993.

Vísandi til pkt. 1 - 6 í hesum áliti skal rætturin kanna:

1) **Leiklutin og ábyrgdina hjá Fíggjareftirlitinum í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

2) **Leiklutin og ábyrgdina hjá Fíggingargrunninum í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

3) **Leiklutin og ábyrgdina hjá Forsætismálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum og Ídnaðarmálaráðnum í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

4) **Leiklutin og ábyrgdina hjá grannskoðanini í Føroya Banka í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

5) **Leiklutin og ábyrgdina hjá Den Danske Bank í Føroya Banka í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

6) **Leiklutin og ábyrgdina hjá nevnd og stjórn í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

Niðurstøðan av kanningini verður latin Ríkisstjórnini, Landsstýrinum, Fólkatinginum og Løgtinginum.

2. viðgerð 19. januar 1995. Undan 2. viðgerð løgdu miðflokkurin og kristiligi fólkaflokkurin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at heita á ríkisstjórnina um smbr. grein 21 a í rættargangslógini at seta ein kanningarrætt við hesum komissorium:

Kanningarrætturin skal kanna og greiða gongdina viðv. partabrævaumbýtinum í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum 22. mars 1993.

Rætturin skal kanna:

1) **Leiklutin og ábyrgdina hjá fíggjareftirlitinum í sambandi við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars 1993.**

2) **Leiklutin og ábyrgdina hjá fíggingargrunninum í sambandi við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars 1993.**

3) **Leiklutin og ábyrgdina hjá forsætismálaráðnum, fíggjarmálaráðnum og ídnaðarmálaráðnum í sambandi við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars 1993.**

4) **Leiklutin og ábyrgdina hjá grannskoðanini í Føroya Banka í sambandi við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars 1993.**

5) **Leiklutin og ábyrgdina hjá Den Danske Bank í Føroya Banka í sambandi við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars 1993.**

6) **Leiklutin og ábyrgdina hjá nevnd og stjórn í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum í sambandi við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars 1993.**

7) **Leiklutin og ábyrgdina hjá landsstýrinum, føroysku politikarunum, embætismonnum og ráðgevarum í sambandi við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars 1993.**

8) **Leiklutin og ábyrgdina hjá landsbanka Føroya í sambandi við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars 1993.**

Niðurstøðan av kanningini verður latin ríkisstjórnini, landsstýrinum, fólkatinginum og løgtinginum.

Viðmerkingar:

Vísandi til álitið hjá rættarnevndini um bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið hin 22. mars 1993 eru vit av teirri áskoðan, at eisini leikluturin og ábyrgdin hjá landsstýrinum, føroysku politikarunum og embætismonnunum eins væl og landsbanka Føroya eigur at verða kannaður av tí sama kanningarrætti, sum skotið er upp skal kanna forsætismálaráðið, fíggjarmálaráðið, ídnaðarmálaráðið, fíggjareftirlitið, fíggingargrunnin, Den Danske Bank og grannskoðarar í Føroya Banka, nevnd og stjórn í Sjóvinnubankanum og Føroya Banka.

Tað viknar um áheitanina á donsku stjórnina, um so er, at teir føroysku politikararnir og embætismenninir ikki skulu dómarakannast javnsíðis teimum donsku.

Málið varð beint aftur í rættarnevndina, sum seinni sama dag 19. januar 1995 legði fram soljóðandi

Ískoytisálit

Málið fekk 2. viðgerð á tingfundi 19. januar 1995 og varð beint aftur í rættarnevndina. Nevndin hevur viðgjørt málið og leggur fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

1) Í uppskotið til samtyktar í álitinum hjá rættarnevndini verður pkt. 4 orðað soleiðis:

4) Leiklutin og ábyrgdina hjá grannskoðanini í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.

og skoytt verður uppí sum pkt. 7:

"7) Leiklutin og møguliga medábyrgd hjá Føroya Landsstýri í sambandi við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993."

2) Løgtingið heitir á landsstýrið um at skipa so fyri, at § 21a í donsku rættargangslógini verður lýst at galda í Føroyum eisini.

Framhaldandi 2. viðgerð 19. januar 1995. Broytingaruppskotið frá miðflokkinum og kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki varð aftur tikið. Broytingaruppskotið í ískoytisálitinum varð samtykt við 31-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar í ískoytisálitinum samtykt við 30-0 atkvøðum.

25 Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn v.m.

Ár 1994, týsdagin 29. november legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíð við løn v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 2. apríl 1993, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 21, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 3.** Fæ grunsins fer til at tíggja tiltøk, ið útvega løntakarum frítíðarmøguleikar. Í førum, har talan er um trotabúarviðgerð av peningastovni, kann frítíðargrunnurin, í tann mun fæ grunsins røkkur, tryggja løntakara frítíðarlønarkrøv, móti at vinna rættin til kravið mótvegis trotabúnum."
2) § 21, stk. 5 verður strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Lógin fevnir eisini um frítíðarløn-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om ferie med løn m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 30 af 7. april 1986 om ferie med løn m.v., som senest ændret ved lagtingslov nr. 71 fra 2. april 1993, foretages følgende ændringer:

1) § 21, stk. 3 affattes således:
"**Stk. 3.** Fondens midler anvendes til finansiering af formål, der tilvejebringer feriemuligheder for lønmodtagere. I tilfælde, hvor der er tale om konkursbehandling af et pengeinstitut, kan feriefonden, i det omfang fondens midler strækker, sikre lønmodtagers krav på ferieløn, mod at erhverve kravet mod konkursboet."
2) § 21, stk. 5 ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Stk. 2. Loven omfatter også krav op

arkrøv, sum vóru greið til útgjaldingar 2. mai 1994.

ferieløn, der var klar til udbetaling 2. maj 1994.

Viðmerkingar:

Sambært kunngerð nr. 14 frá 16. februar 1987 um frítíðarløn við seinni broytingum, skal tað einstaka løntakarafelagið hava frítíðarlønarkonti í føroysku peningastovnunum.

Sum støðan er í dag, veitir "Indskydergarantifonden" einans 250.000 kr. fyri frítíðarlønarkonti. Hetta metir landsstýrið at vera sera óheppið og skjýtur tí upp at víðka reglurnar fyri frítíðargrunnin soleiðis, at grunnurin, tá talan er um trotabúðaviðgerð av peningastovni, í tann mun fæ grunsins røkkur, kann tryggja løntakara frítíðarlønarkrøv, móti at vinna rættin til kravið mótvegis trotabúnum.

Viðmerkingar til einstøku broytingarnar:

ad 1: Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri.

ad 2: Skotið verður upp at strika nesa lógargrein, sum sigur, at fæið, sum er í grunninum pr. 1. apríl 1993, verður latið Arbeiðsloysistryggingini. Henda grein hevur sostatt ongan týdning.

ad § 2: Skotið verður upp, at krøv, sum vóru greið til útgjaldingar 2. mai 1994, verða fevnd av hesi lógarbroyting.

1. viðgerð 8. desember 1994. Málið varð beint í arbeiðsmálanevndina, sum 14. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. november 1994 og eftir 1. viðgerð 8. december 1994 beint í arbeiðsmálanevndina.

Undir 1. viðgerð í tinginum vísti tað seg at vera ymiskar fatanir av, hvat Frítíðargrunnurin stendur fyri, og heitti tingformaðurin tí á nevndina at lýsa hetta eitt sindur gjøtilari.

Nevndin hevur á fundi 12. december viðgjørt málið og hevur hesar viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn v.m. verður í § 10, stk. 2, sagt:

"Frítíðarlønin fellur til gjaldingar samstundis við lønini og verður goldin avvarðandi løntakarafelag ella, um eitki umboðandi løntakarafelag finst, Frítíðargrunninum í varðveitslu, til frítíðin skal haldast, jbr. § 7. Landsstýrinum er heimilað at fyriseta nærri reglur fyri skipanini."

§ 17 í somu lóg sigur:
"Rætturin til frítíðarløn, løn í frítíðini ella frítíðarískoyti fyrnast, um krav til rættin ikki verður fráboðað arbeiðsgevaranum fyri 1. apríl í frítíðarárinum, frítíðin skal takast.
2. stk. Ger arbeiðsgevarin ikki eftir kravinum, fyrnast tað, um ikki løntakarin uttan óneyðugt dvøl letur kravið fremja.
3. stk. Er kravið fyrnað, fer upphæddin í Frítíðargrunnin."

§ 18 í somu lóg sigur:
"Frítíðarløn, ið ikki er tikin út í frítíðarárinum, sum frítíðin skuldi verið tikin, fer í frítíðargrunnin."

§ 21 í somu lóg sigur:
"Frítíðargrunnurin er grunnur undir landsstýrinum.
2. stk. Frítíðargrunnurin tekur ímóti frítíðarløn í varðveitslu og syrgir fyri útgjalding, tá hon sambært hesa lóg kann útgjaldast viðkomandi løntakara.
3. stk. Fæ grunsins fer til at figgja tiltøk, ið útvega løntakarum frítíðarmøguleikar.
4. stk. Landsstýrið ásetir nærri reglur fyri virki grunsins og fyrisiting av grunninum."

Avvarðandi umsitingarmyndugleiki í landsstýrinum hevur váttað yvirfyri løgtingsumsitingini, at virksemið hjá Frítíðargrunninum er beint lýst við ávísing til omanfyri lógargreinum.

Kunngerð landsstýrisins nr. 14 frá 16. februar 1987 ásetir í § 1, at Líkningarráðið fyrisitur skipanina viðvíkjandi inn- og útgjaldingum og í § 2, stk. 2, at um løntakarin einki umboðandi løntakarafelag hevur at vísa á, skal frítíðarlønin rindast á frítíðarlønarkonto hjá Frítíðargrunninum.

Samd nevnd tekur undir við teimum uppskotum til broyting av lógini, sum landsstýrið hevur skotið upp, og sjálvt um ein eftir umstøðunum heldur, tað vera rætt eisini at lata lógarbroytingina fevna tey krøv, ið vóru greið til útgjaldingar 2. mai 1994, vil nevndin gera eina viðmerking um tað óhepna í at seta lógir í gildi við afturút virkandi kraft.

Tá eingin reglugerð finst um virksemið hjá Frítíðargrunninum, mælir ein **samd nevnd** til, at ein slík verður gjørd skjótast, og setir sostatt fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at tilevna reglugerð fyri Frítíðargrunnin.

2. viðgerð 19. desember 1994. Uppskot landsstýrisins samtykt við 17-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá samdari nevnd samtykt við 23-0 atkvøðum.

3. viðgerð 22. december 1994. Málið beint aftur í arbeiðaramálanevndina, sum 31. januar 1995 legði fram soljóðandi

Áitt II

Málið, sum varð lagt fram av landsstýrinum, var undir 3. viðgerð 22. december 1994 aftur beint í arbeiðaramálanevndina.

Til 3. viðgerð, sum fór fram 22. december 1994, varð bræv lisið upp frá nevndini í Frítíðargrunninum. Tingið bað hereftir nevndina taka málið aftur til nýggja viðgerð.

Nevndin hevur havt fund við teir báðar, Óla Jacobsen, landsstýrismann, og Sørin Pram Sørensen, formann í nevndini fyri Frítíðargrunnin, og er framvegis samd um at taka undir við teimum uppskotum til broyting, sum landsstýrið hevur sett fram.

Serliga er tað spurningurin um ognartøku, ið upptók nevndina, og var nevndin samd um, at tá ið grunnurin legði pening út og yvirtók kravið mótvegis peningastovninum, kundu hetta ikki roknast sum ognartøka uttan mun til, hvat virði eitt tílíkt krav kann metast at hava.

Tí er ógvuliga umráðandi hjá nevndini at fáa í reglugerðina, at samstundis við at grunnurin leggur pening út, so skal nevndin í Frítíðargrunninum seta kravið fram móti peningastovninum.

Samsvarandi omanfyristandandi setir nevndin fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at skeyta uppí § 2 sum nýtt stk. 4 í kunngerð nr. 101 frá 12. august 1988 um virki og fyrisiting av frítíðargrunninum:
"Nevndin hevur skyldu at krevja útlagdan pening aftur beinanvegin, útgjalding er farin."

Framhaldandi 3. viðgerð 2. februar 1995. Eftir uppskoti frá Henrik Old, løgtingsmanni varð við 18-0 atkvøðum samtykt at beina málið aftur í arbeiðaramálanevndina, sum 23. februar 1995 legði fram soljóðandi

Álit [1]

Málið, sum varð lagt fram av landsstýrinum, var undir 3. viðgerð 22. december 1994 aftur beint í arbeiðaramálanevndina.

Við framhaldandi 3. viðgerð 2. februar 1995 varð málið aftur beint í arbeiðaramálanevndina.

Samd nevnd setir síðani fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at skoyta uppí § 2 sum nýtt stk. 4 í kunngerð nr. 101 frá 12. august 1988 um virki og fyrisiting av frítíðargrunninum:
"Nevndin hevur skyldu at krevja útlagdan pening aftur beinanvegin, útgjalding er farin fram."

Framhaldandi 3. viðgerð 9. mars 1995. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar samtykt við 21-0 atkvøðum.

Lóg nr. 40 frá 14. mars 1995.

FL jnr. 1300-1/91.

26 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om ændring af lov for Færøerne om folkepension og lov for Færøerne om invalidepension m.v. (indførelse af optjeningsbestemmelser)"

Ár 1994, týsdagin 29. november legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at "Lov om ændring af lov for Færøerne om folkepension og lov for Færøerne om invalidepension m.v. (indførelse af optjeningsbestemmelser)" verður sett í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:
Frá 8. juli 1994 hevur Nordisk Konvention om Social Sikring verið galdandi fyri Føroyar. Tá konventiónin í vár varð løgd fyri løgtingið til góðkenningar, gjørdi landsstýrið samstundis vart við, at tað fór at vera neyðugt at gera broytingar í okkara pensjónslóggávu, so hon var í samsvar við konventiónina.

Hjálagt er uppskot tilevnað í samráð við Almannamálaráðið viðvíkjandi broyting í fólkapensjónslógini og avalamispensjónslógini.

Broytingin í fyriliggjandi lógaruppskoti er eina mest, at heimild fæst fyri at gjalda út partpensjónir.

Í lógaruppskotinum er ásett ígildissetan til 1. januar 1995, og verður lógaruppskotið undir viðgerð í fólkatinginum samstundis sum í løgtinginum. Við aliti til at lógaruppskotið kann samtykkjast áðrenn jólafrítíðin hjá fólkatinginum, er 3. viðgerð sett til 15. desember 1994. T.v.s. at skal lógarbroytingin koma í gildi 1. januar 1995 krevst, at lógaruppskotið er samtykt í løgtinginum innan 15. desember 1994.

Viðvíkjandi nærri upplýsingum um broytingarnar verður víst til viðmerkingarnar í lógaruppskotinum.

1. viðgerð 2. desember 1994. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 5. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. november 1994 og eftir 1. viðgerð tann 2. desember 1994 beint í Almanna- og heilsunevndina.

Sum tað stendur í viðmerkingum landsstýrisins so viðføtir lógaruppskotið eina mest, at heimild fæst fyri at gjalda út partpensión í Føroyum.

Uppskotið inniheldur neyðugar broytingar í fólka- og avlamispensiónslógini sum fylgja av at Nordisk Konvention om Social Sikring kom í gildi í Føroyum tann 8. juli 1994.

Fyri at lógin skal koma í gildi í Føroyum tann 1. januar 1995 krevst, at lógaruppskotið er samtykt í løgtinginum innan 15. desember 1994.

Málið kom til 1. viðgerð 2. desember 1994 og átalar nevndin, at skotbráðið at viðgera málið nøktandi er so stutt. Nevndin heitir á landsstýrið um framyvir at leggja mál í so góðari tíð fyri tingið at nevndin hevur ein veruligan møguleika at viðgera málini.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur Danska Almannaráðið m.a., at broytingarnar ikki føra øktar útreiðslur fyri landskassan við sær.

Hinvegin metir Almannaráðið, at broytingarnar tey komandi árini koma at hava smávegis sparingar fyri landskassan við sær.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 8. desember 1994. Málið samtykt við 18-0 atkvøðum.

27 Lóg um heildarveiting til Føroyar

Ár 1994, týsdagin 29. november legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur undir við viðlagda uppskoti til "Lov om tilskud til Færøernes hjemmestyre for 1995".

Viðmerkingar:

Í 1987 varð ein partur av ríkisstuðninginum til almannamál, heilsumál og skúlamál umlagdur til eina heildarveiting.

Við lóg nr. 303 frá 22. juni 1993 varð allur stuðulin til nevndu økir veitutr sum ein heildarveiting og stuðulin fyri tíðina 1. juli til 31. december 1993 varð í lógini ásettur til 404,9 mió. kr. og studningurin í 1994 til 809,9 mió. kr. Blokkstuðulin verður í 1994 826,1 mió. kr. aftaná regulering.

Í felagslýsingini millum stjórnina og landsstýrið frá 17. november 1994 varð semja um, at blokkstuðulin fyri 1995 skuldi verða óbroyttur og svarar hetta til ein stuðul í 1995 uppá 843,4 mió. kr. aftaná at prístalsreguleringar eru gjørdar.

1. viðgerð 2. desember 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 8. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. november 1994 og eftir 1. viðgerð tann 2. desember 1994 beint í fíggjarnevndina.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Anfinn Kallsberg hevur hesar viðmerkingar: Fyriliggjandi uppskot er ein partur av avtaluni frá 17. november 1994 millum Føroya Landsstýri og danska stjórnina.

Fólkaflokkurin heldur ikki at hetta er besta loysnin, tvørtur ímóti. Hetta er bert framhald av verandi politikki.

Fólkaflokkurin heldur at einasta loysnin fyri at koma burtur úr bindingunum við avtaluni við danir, er at kapitalisera heildarveitingina. Uppskot okkara hesum viðvíkjandi varð felt av løgtinginum í seinastu viku. Hetta var stórt spell, tí ein kapitalisering av heildarveitingini kundi gjørt, at vit fingu goldið alla okkara skuld, og hevði gjørt tað møguligt hjá føroyskum politikarum at finnið eina føroyska loysn á teim stóru trupulleikunum ið Føroyar eru í.

Í øðrum lagi heldur Fólkaflokkurin, at heildarveitingin eigur ikki at hækka, men heldur, sum viðmælt í "Rapport om ændringer af den færøske bloktilskudsordning m.v." dagfest 22/3-94, lækka við 30 - 40 mió. kr. um árið. Heldur ikki hetta vinnur frama á Løgtingi og tí er neyvan nøkur onnur gongd leið í dag, enn at taka undir við fyriliggjandi uppskoti, hóast hetta bert er trið besta loysnin.

Signar á Brúnni hevur hesar viðmerkingar: Tjóðveldisflokkurin hevur ferð eftir ferð víst á, at tann skipanin við "refusión", ið hevur verið galdandi hígartil, hevur havt keðiligar avleiðingar við sær og bundið føroyska samfelagið nærri at øðrum samfelagi. Tjóðveldisflokkurin vildi mælt til, at heildarveitingin verður lækkað á hvørjum ári yvir eitt ávíst áramál til hon er komin niður á null og føroyingar sjálvir átaka sær fulla ábyrgd av landinum. Tjóðveldisflokkurin ásannar, at meirluti er ikki fyri hesum á tingi í dag, og tekur tí undir við framlagda uppskoti, ið hóast alt er ein bati sammett við galdandi skipan.

2. viðgerð 9. desember 1994. Málið samtykt við 25-0 atkvøðum.

28 Uppskot til samtyktar um fiski- og oljusamvinnu við Noreg

Ár 1994, friggjadagin 2. desember løgdu løgtingsmenninir John Petersen og Óli Breckmann fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum í hesum fiskivinnusamráðingum við Noreg at gera Oslo-stjórnini greitt, at um Noreg vísir ikki betri bróðuranda og grannasið móti Føroyum fiskivinnuliga, fær tað fylgir fyri ætlanirnar hjá almenna norska Statoil um at sleppa upp í part í møguligari oljuvinnu á føroyskum búskaparøki.

Viðmerkingar.

Noreg hevur verið ringur granni hjá Føroyum, hóast føroyingar hava bygt fyri milliardir í skipum á norskum skipasmiðjum. Tá er munur á Íslandi, sum í bróðuranda og uttan mótkrøv hevur loyvt føroyskum fiskiskipum so nógvan botnfisk, at tað hevur borið parti av flota og virkum okkara uppi.

Frá Noreg hava føroyingar bert fingið kvotur aftur fyri tilsvarandi norsk fiskirættindi í føroyskum sjóøki. Hetta hóast Noreg hevur 8-10 ferðir so stórar fiskastovnar sum Føroyar, og norska útflutningsvirðið á fiski liggur um 18 mia. kr. í ár. (hitt føroyska er uml. 2 mia. kr.)

Uttan fiskisáttmálarnar við Rusland (fyrr Sovjet) og ES høvdu føroyingar helst langt síðan verðið settir á dyr úr norskum sjógvi.

Nýliga er norska hervaldið farið at forfylgja føroyskum sjómonnum við krígskipum og stríðstyrlum, enn tá í altjóða sjógvi.

Fyri at seta trumfin á eyðmýkingina av fámentu og nú illa fyrikomnu Føroyum hevur norski stríðsflotin tikið føroysk skip og lagt so stóra sekt á tey, at tey fara av knóranum.

Herfyri frættist, at almenna norska oljufelagið Statoil var á sjarmuoffensivi í Føroyum. Føroyingum líkt móti fremmandafólki var landsstýrið fyrikomandi og tosaði við norsku oljumenninar. Enn tá er litfagur prentlutur útkomin, har Statoil í ritheitinum lovar at taka lógvatak(!) fyri Føroyum.

Men eftir Statoil vitjanina í Føroyum hevur sama norska stjórn, sum eigur Statoil, aftur jagstrað føroyingar, seinast ígjøgnum russisku samráðingarnevndina um fiskiveiði í Barentshavinum.

Føroysku samráðingarnar við Noreg standa fyri durum. Tær vera í Havn komandi viku. Tí er umráðandi, at løgtingið áðrenn fundin komandi viku ger Brundtland-stjórnini klokkuklárt, at Noreg í stundini má gevast at jagstra føroyingar fiskivinnuliga.

Helst átti Oslo í viðbót at víst sín góða vilja móti hesum fámenta granna Føroyum (bert 1/100 av Noreg) við ókeypis fiskikvotum svarandi til nøkur tíggju túsund tons í toskavirði. Annars verður Statoil svartlistað og frammanundan útihýst millum tey oljufeløg, ið sleppa upp í part, um borað verður eftir gassi og olju í føroyskum búskaparøki.

1. viðgerð 14. desember 1994. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 18. apríl 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av løgtingsmonnunum Óla Breckmann og John Petersen tann 2. desember 1994 og eftir 1. viðgerð 14. desember 1994 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Helena Dam á Neystabø, J. A. Johannessen, Jógvan I. Olsen, Ingeborg Vinther, Jógvan Durhuus og Jenis av Rana) metir ikki, at spurningar um vinnuligt samstarv millum lond eiga at verða viðgjørdir á henda hátt, og tekur meirilutin tí ikki undir við málinum.

Minnilutin (Bjarni Djurholm) tekur undir við málinum.

2. viðgerð 27. apríl 1995. Málið varð aftur tikið.

29 Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn

Ár 1994, mánadag 2. desember legði Fólkaflokkurin fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíð við løn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 10., 2. stk. verða orðini "viðkomandi løntakarafelag ella, um eingi umboðandi løntakarafelag finst," strikað.
2) Í § 11., 2. stk. verða orðini "viðkomandi løntakarafelag ella, um eingi umboðandi løntakarafelag finst," strikað.
3) § 21., 2. stk. verður soljóðandi:
   "**2. stk.** Frítíðargrunnurin tekur ímóti frítíðarløn í varðveitslu og syrgir fyri útgjalding við tilskrivaðari rentu, tá hon sambært hesi lóg kann útgjaldast viðkomandi løntakara."
4) Sum nýtt § 21., 3. stk. verður sett:
   "**3. stk.** Frítíðargrunnurin setur innkomnu frítíðarlønina á frítíðarlønarkonto hjá viðkomandi løntakara í føroyskum peningastovni til hægstu rentu. Frítíðargrunnurin hevur loyvi at rokna sær ómaksløn fyri umsiting, tó hægst 10% av tilskrivaðu nettorentini."
5) § 21. 3. stk. og 4. stk. verða § 21. 4. stk. og 5. stk.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om ferie med løn.

§ 1.

I lagtingslov nr. 30 fra 7. april 1986 om ferie med løn med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 10., stk. 2. slettes ordene: "til vedkommende lønmodtagerforbund, hvor et sådant ikke forefindes,".
2) I § 11., stk. 2. slettes ordene: "til vedkommende lønmodtagerforbund eller hvis et sådant ikke forefindes,".
3) § 21., stk. 2. formuleres således:
   "**Stk. 2.** Feriefonden modtager ferieløn til opbevaring og sørger for udbetaling, med tilskrevet rente, når den i henhold til denne lov kan udbetales til vedkommende lønmodtager."
4) Som nyt § 21., stk. 3 indsættes:
   "**Stk. 3.** Feriefonden indbetaler den udbetalte ferieløn til vedkommende lønmodtagers ferielønskonto i færøsk pengeinstitut til højeste indskudsrente. Feriefonden er hjemlet at beregne sig administrationsgebyr, dog højst 10% af den tilskrevne nettorente."
5) § 21. stk. 3. og stk. 4. bliver § 21. stk 4. og stk. 5.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Síðan 1986 hava arbeiðara- og fiskimannafeløgini fingið inngoldið frítíðarløninа hjá limunum í Frítíðargrunn.

Úrslitið hevur verið, at fakfeløgini hava nú savnað íalt 40 - 50 mió. kr. í rentum frá hart forvunnu inntøkum verka- og fiskimanna. Harafturímóti hava limirnir bert fingið frítíðarløninа útgoldna uttan rentutilskriving frá árinum fyri.

Við hesum uppskoti er ætlanin, at hereftir verða tað verkafólk og fiskimenn sjálvir, sum fáa bæði frítíðarløn og rentuágóðan í sín part. Uppskotið lítur altso framefitir í verandi líki.

Men løgtingsnevndin, sum fær hetta lógaruppskot til viðgerðar, átti eisini at umhugsað at farið víðari og skotið upp fyri tinginum, at tær 40 - 50 mió. kr., sum longu nú standa ónýttar í Frítíðargrunninum, verða útgoldnar limunum í tann mun, hesir eiga rætt til hesar tiggjutals mió. kr. eftir inngjøldum teirra í grunnin síðan 1986.

Er talan um eini 4-5.000 løntakarar íalt, fær hvør teirra í miðal útgoldið 10.000 kr. í part, hetta er jú av røttum limanna peningur og ikki fakfelagans ogn.

Vandi er nú fyri, at fakfeløgini - til tess at bjarga Verkamannafylkingini politiska skinnið - fara at seta hesar hart forvunnu rentukrónur upp á spæl í villum og ólønsomum alment stuðlaðum verkætlanum, sum upp á forhond eru dømdar til at miseydnast.

1. viðgerð 16. januar 1995. Málið var beint í arbeiðaramálanevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 2. desember 1994. Við 1. viðgerð tann 16. januar 1995 varð málið beint í arbeiðaramálanevndina.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið. **Ein samd nevnd** tekur ikki undir við uppskotinum.

Nevndin er av tí fatan, at løntakararnir hava givið limafeløgunum rættin til rentutilskrivingina. Ein broytan av hesum viðurskiftum eigur at verða gjørd innanhýsis av pørtunum.

2. viðgerð 22. mai 1995. Málið fall við 3-0 atkvøðum.

30 Fíggjarløgtingslóg 1995

Ár 1994, fríggjadagin 2. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Sí skjal ...

ALMENNAR VIÐMERKINGAR

Sambært galdandi stýrisskipanarlóg skal landsstýrið innan 1.september leggja fram uppskot um fíggjarlóg fyri komandi fíggjarár.

Sitandi landsstýrið varð valt 15. september, og legði tí landsstýrið, sum sat fram til henda dag, fram uppskot til fíggjarlóg fyri 1995 seinast í august mánaða. Hetta uppskot, sum vísti eitt hall upp á 308 mió. kr., hevði av góðum grundum ikki lingið nakra politiska viðgerð, men varð lagt fram, sum fyriskrivað er í stýrisskipanarlógini.

Nýggja landsstýrið hevði tí tveir møguleikar í at velja í samband við fíggjarlógaruppskotið. Annar var, at gjørdar vórðu broytingar til framlagda uppskotið. Hin var, at landsstýrið legði fram nýtt uppskot til fíggjarlóg. Hesin seinni møguleiki varð valdur, tí broytingarnar vórðu so nógvar, at hetta varð tikið sum tað mest ruddiliga at gera fyri allar partar.

At tað síðan hevur drigið so nógv út á árið, áðrenn uppskotið verður lagt fram, hevur sína grundgeving í, at landsstýrið fyrst vildi hava samráðingarnar við donsku ríkisstjórnina frá hondini.

Sambært áður gjørda avtalu við donsku stjórnina, skal fíggjarlógaruppskotið takast upp sum mál á fundi við danir, tá ið árligu fundirnir eru um m.a. endurfígging av okkara uttanlandsskuld. So varð eisini gjørt á fundinum 17. november í ár. Semja var um, at hallið í 1995 ikki skal verða størri enn 220 mió. kr., og at hallið í 1998 skal vera burtur. Hetta skal vera gjørt við bygnaðarsparingum og við vøkstri í inntøkum landskassans sum fylgja av tí framtakspolitikki, landsstýrið hevur sett sær fyri at reka.

Hetta eru krøv til okkara fíggjarpolitikk, sum landsstýrið sjálvt frammanundan hevur sett sær, tí framhaldandi hall á fíggjarlógini er í longdini als ikki nøkur gongd leið.

Uppskot landsstýrisins til fíggjarlóg fyri 1995 vísir, at samlaðu inntøkurnar verða 2 mia. 544 mió. kr., og skal her leggjast afturat, at vanligur landsskattur varisliga verður mettur til 682 mió. kr., og inntøkuskattirnir tilsamans verða mettir til 789 mió. kr. Rakstrarútreiðslurnar tilsamans verða mettar til 2 mia. 677 mió. kr., av hesum er viðlíkahald 70,1 mió. kr. Harafturat eru játtaðar 82,4 mió. kr. til íløgur.

Úrslitið av rakstri gerst sostatt 132,9 mió. kr. í halli, meðan hallið aftan á viðlíkahald og íløgur verður 215,3 mió. kr.

Tað, sum hevur gjørt arbeiðið við hesi fíggjarlóg so trupult, og sum tað uttan iva eisini vil verða fyri komandi fíggjarlógir, er, at vit framvegis eru í búskaparliga aldudalinum. Fylgjurnar av hesi búskaparstøðu síggja vit m.a. í stóra arbeiðsloysinum og stóru fráflytingini. Men vónandi fer tann politikkur, sum landsstýrið hevur sett sær fyri at reka, at virka fyri, at vit skjótt fara at taka okkum upp úr hesum aldudali.

Skynsamur búskaparpolitikkur átti annars at verið, at vit í hesum døgum við almennum peningi stimbraðu vinnuskapandi tiltøkum munandi meira, enn vit gera. Men til hetta krevst sjálvsagt, at neyðugur avlopspeningur er lagdur til síðis tey góðu árini, sum nú við skynsemum brúki kundi tikið broddin av samfelagskreppuni. Men so varð ikki gjørt tá, og tí mugu tøk framhaldandi takast, sum vit øll mugu lyfta í felag.

Politikkur landsstýrisins hevur sum eitt høvuðsendamál at tryggja vinnuliga menning, so komast kann burturúr búskaparliga aldudalinum, vit nú eru í.

Landsstýrið ætlar við ymsum tiltøkumum á vinnulívsøkinum so sum framtaksgrunni, ábyrgdargrunni, stuðuli av ymiskum slag serliga til nýggj vinnutiltøk, lækking av kostnaðarstøði (streymprísi) o.m.ø., at stuðla eini skilagóðari og rímiliga skjótari menning av føroyska vinnulívinum og búskapinum.

Landsstýrið undirstrikar týdningin av, at okkara egnu fiskastovnar fáa møguleika at menna seg aftur, so hesir um ikki alt ov langa tíð kunna gerast grundarlag fyri øktari fiskiveiðu og øktari fiskaframleiðslu á høgum stigi. Men í hesum tíðarskeiði er neyðugt at møguleikarnir í altjóða sjógvi verða munandi meira troyttir.

Hin vegin vita vit, at hvørki vinnupolitikkur ella fiskivinnupolitikkur førir á mál eftir einum ári.

Tí er tað av alstórum týdningi, at nakað munagott verður gjørt til tess at tálma fráflytingini í nevnda tíðarskeiði.

Tað er ein sannroynd, at samfelagið, sum støðan er í løtuni, ikki kann útvega øllum landsins borgarum vinnumøguleikar, men landsstýrið bæði trýr og vónar, at brúk verður fyri øllum, áðrenn langt umlíður. Landsstýrið hevur tí valt at bøta um arbeiðsloysisskipanina so tey, ið eru arbeiðsleys, fáa eitt tryggari inntøkustøði og eitt longri skotbrá.

Somuleiðis ætlar landsstýrið at lætta um trýstið á inntøkuskattin til tess at minka um áhugan hjá hesum bólkum til at flyta av landinum.

Hallið á fíggjarlógini er í sjálvum sær ein stórur trupulleiki, sum bert við neyvari politiskari stýring kann fáast burtur, men vit hava nú harumframt sjálvir ábyrgdina av, hvussu hetta hall verður fíggjað. Tí verður í hesum døgum seinasta hond lagd á fyrireikingarnar til eina føroyska brævalánsútgávu. Tað er landsstýrisins vón, at hetta tiltak fær góða undirtøku frá áhugaðum í Føroyum og aðrastaðni.

Fíggjarlógirnar seinastu árini hava verið merktar av stórum rakstrar- og fløgusparingum.

Hetta uppskotið er einki undantak. Men landsstýrið heldur ikki, at vit í stóran mun framhaldandi kunna fremja sparingar við prosentvísum skerjingum. Tí verður eisini nú fyrireikað ein djúptøkin kanning av okkara almenna rakstri. Fyrsta uppgávan við hesum arbeiði verður at finna ein bygnað fyri ta almennu umsitingina, sum ger hana føra fyri at veita okkum tær tænastur, vit ynskja, fyri ein kostnað, sum vit eru mentir og sinnaðir at bera. Síðan verður farið undir djúptøknar kanningar av ymsu útreiðsluøkjunum á fíggjarlógini, soleiðis at meira langsiktaðar og strukturellar broytingar kunnu gerast í almenna sektorinum.

Eisini er tað ein politiskur setningur, at farið verður undir at útvega okkum eina dygga fíggjarstýringsskipan, soleiðis at vit neyvari vita, hvat vit brúka almennan pening til. Í hesum sambandi er tað eisini landsstýrisins ætlan at fremja munandi tiltøk til tess at vit fáa eina virkna eftirstøðuinnkrevjing.

Landsstýrið ynskir við ætlaða politikkinum at bøta um ringastu fylgjurnar av kreppuni. Hvussu skjótt vit koma burtur úr kreppuni, kann eingin í dag siga, men fyrstu tekini um, at búskaparliga afturgongdin er um at steðga, kunnu síggjast. Samlaðu lønarútgjaldingarnar lækkaðu við heili 16 prosentum frá 1992 til 1993, meðan hesar bert lækkaðu 4 prosent frá í fjør. Lønirnar í privatu vinnuni eru í vøksturi.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at stuðla hesi gongdini og venda afturgongd til framgongd í hesum valskeiði, so føroyingar allir, bæði heima og úti, vinna aftur trúnna um, at vit eiga eina framtíð í hesum landi.

VIÐMERKINGAR TIL INNTØKUGREINARNAR

Grein 1: INNTØKUSKATTIR

Vanligur landsskattur: 682 mió. kr.:
A- og B-inntøkuskattir: Landsstýrið roknar við óbroyttum skattagrundarlagi í 1995. Metingin byggir m.a. á inntøkugrundarlagið higartil í 1994, t.v.s. fyribils A og B-inntøkur.

Útreiðslur landskassans til lønir minka við umleið 35 mió. kr. frá 1994 til 1995 orsakað av sparingum. Roknast kann somuleiðis við, at krígspensiónirnar minka munandi í 1995, orsakað av teimum nógvu einaferðsgjøldunum í 1994.

Hinvegin verður roknað við einum vøkstri í lønarútgjaldingunum í privatu vinnuni. Somuleiðis verður roknað við, at skattafrádráttir vegna borganarskyldur og hall av egnum virki fara at minka nakað í 1995.

Varisliga mett heldur landsstýrið at roknast kann við óbroyttum skattainntøkugrundarlagi.

Hinvegin ætlar landsstýrið at gera fleiri skattalógarbroytingar og aðrar broytingar fyri

1995. Hesar ávirka skattainntøkurnar, sum víst í talvuni niðanfyri:

Skattainntøka við óbroyttum politikki:	690 mió. kr.
Lækking av marginalskatti	28 -
Hækking av botnfrádrátti hjá pensionistum	6 -
Ferðafrádráttur	5 -
Meirskattur, tí bert goldnar rentur kunnu frádragast	+ 5 -
	656 mió. kr.
Skattur av meirjáttan til ALS	+ 16 -
Meirskattur av rentulækking hjá pen.st.	+ 10 -
Væntað skattainntøka 1995	**682 mió. kr.**

Vanligi skatturin er tí mettur til at geva landskassanum 682 mió. kr. í 1995, t.v.s. 8 mió. kr. minni enn mett í 1994.

Broytingin av marginalskattinum uppá 28 mió. kr. kemur við at lækka cykaskattaprosentini í landsskattatalvuni fylgjandi:

Landsskattatalva 1994

Er inntø. kr.	men minni enn kr.	verður latið kr.	av	og av restini
22.500	60.000	0	22.500	15%
60.000	140.000	5.625	60 000	31%
140.000	220.000	30.425	140.000	36+4 = 40%
220.000	300.000	62.425	220.000	39+6 = 45%
300.000		98.425	300.000	43+8 = 51%

Uppskot til landsskattatalvu fyri 1995

Er inntø. kr.	men minni enn kr.	verður latið kr.	av	og av restini
22.500	60.000	0	2.500	15%
60.000	140.000	5.625	60.000	31%
140.000	220.000	30.425	140.000	36,5%
220.000	300.000	59.625	220.000	40%
300.000		91.625	300.000	44%

Lindamálið við hesum skattalækkingum er tálma frálýtingini og annars at skapa grundarlag fyri meira virksemi.

Felagsskattur: 37 mió. kr.:
Í 1994 er skattaprosentið 22% fyri felløg við einum partapeningi uppá 300.000 og 49% fyri felløg við einum partapeningi minni enn 300.000 kr. Landsstýrið ætlar at hækka felagsskattin úr 22% til 27% fyri felløg, sum hava ein partapening ella lutapening uppá

300.000 kr. og 49% fyri felløg, sum hava ein partapening ella lutapening, ið er minni enn 300.000 kr.

Hækkingin av felagsskattinum er gjørd við tí fyri eyga at gera tað møguligt at fáa skattasáttmálar við grannalond okkara um skatting av vinnurekandi felløgum.

Felagsskatturin er mettur at geva landskassanum 37 mió. kr. ella 7 mió. kr. í meirinntøkum.

Rentuskattur: 70 mió. kr.:
Rentuskatturin er í ár 22%. Landsstýrið hevur lagt fram uppskot um at hækka rentuskattin til 35% og verður hesin ikki hækkaður aftur í valskeiðnum. Hetta hevur við sær eina inntøku uppá 70 mió. kr. ella eina meirinntøku uppá 26 mió. kr. í 1995.

Endamálið við hesi hækking er fyri ein part at fáa meira inntøkur til landskassan og fyri ein part fyri at tillaga skattaviðurskiftini til tey skattaviðurskifti, sum er galdandi í teimum londum, sum vit hava skattasáttmálar við. Landsstýrið hevur kortini ikki hækkað rentuskattin so nógv, at vandi skuldi verið fyri, at peningur verður fluttur av landinum.

Lækkingin av fíggjarognaravgjaldinum úr 1,9% niður í 0,6% ger tað samlaðu skattingina av rentuinntøkunum munandi lægri enn í 1994.

Eftir hesar broytingar í rentuskattinum er eisini betri samsvar millum frádrátt fyri rentur (40%) í samband við lán og tann rentuskatt (35%) fyri innistandandi, sum skal gjaldast til landskassan.

Grein 2: TOLL-, NÝTSLU- OG FRAMLEIÐSLUGJØLD

Meirvirðisgjald: 502,5 mió. kr.:
Við óbroyttum politikki verður roknað við, at landskassin fær 510 mió. kr. í meirvirðisgjaldi. Landsstýrið arbeiðir við skipan til tess at stuðla upp undir hjá pørtum av tænastuvinnuni fyri eina upphædd uppá 7,5 mió. kr. Her verður hugsað um handverksvinnuna.

Endurgjald fyri goymslu: 0:
Í samband við at farið varð frá innflutningsgjøldum til meirvirðisgjaldsskipan í 1993, varð endurgjaldsskipan gjørd fyri vørur á goymslu. Hetta varð gjørt fyri at tryggja, at avgjald ikki varð goldið tvær ferðir fyri somu vøru. Landsstýrið hevur goldið 108 mió. kr. í endurgjaldi til handilsfyritøkur, nú skipanin fer úr gildi.

Fíggjarognaravgjald: 27,6 mió. kr.:
Fíggjarognaravgjaldið fer væntandi at geva landskassanum eina inntøku uppá 165 mió. kr., sum varð uppkravt ultimo 1993 (55 mió. kr.) og tvær ferðir í 1994 (110 mió. kr.). Í 1995 ætlar landsstýrið at lækka avgjaldið til 0,6% p.a. og at frítaka peninga-

stovnarnar fyri avgjaldsskyldu av lánsbrøvum, sum teir keypa í útlandinum og í Føroyum. Orsakað av hesi frítøku hava peningastovnar sagt seg vilja seta útlánsrentuna av ávísum lánum niður við umleið 0,75%. Harumframt er skotið upp, at avgjaldsskyldan eisini skal fevna um uppsparingar í Tryggingini, og mett verður, at hetta gevur 3,6 mió. kr.

Avleiðingar av øllum hesum broytingum er, at avgjaldið er mett at geva landskassanum 27,6 mió. kr. í 1995.

Samlaða skattingin av rentuinntøkum verður frá 1. januar 1995 sum víst niðanfyri:
Hægsta vanliga innlánsrenta er partacigararenta og ábyrgdararenta. Hon er í løtuni 5,25% p.a. Størri innlánarar kunnu fáa nakað hægri rentu, sokallaða avtalurentu.

		1994		1995
Innlánsrenta		5,25 %		5,25 %
Rentuskattur	22 %	1,16 %	35 %	1,84 %
Fíggjarognaravgj.	1,9 %	1,9 %	0,6 %	0,6 %
Skattur tils.		3,06 %		2,44 %
Skattur av rentuinnt. í %		58 %		46 %

Vanlig renta av eftirlønartryggingum er 7 % p.a. Eftirlønartryggingar í peningastovni verða í løtuni skattaðar við 1,9 % í fíggjarognaravgjaldi, meðan eftirlønartryggingar í tryggingarfeløgum ikki verða skattaðar. Við uppskoti landsstýrisins verða bæði sløg av eftirlønartryggingum skattað á sama hátt frá 1. januar 1995.

	1994	1995
Avkast av eftirlønartrygging		
í peningastovni	7,0 %	7,0 %
Fíggjarognaravgjald	1,9 %	0,6 %
Skattur í % av rentuinnt.	27 %	9 %
Avkast av eftirlønartrygging		
í tryggingarfelag	7,0 %	7,0 %
Fíggjarognaravgjald	0,6 %	
Skattur í % av rentuinnt.	0 %	9 %

Vegskattur: 26 mió. kr.:
Talið av akførum er í minking, og tí verður mett, at vegskatturin gevur 26 mió. kr. ella 2 mió. kr. minni, enn mett í ár.

Ferðaavgjald: 5 mió. kr.:
Ferðaavgjaldið er í 1995 mett at geva landskassanum 5 mió. kr. ella 3 mió. kr. minni enn mett í 1994. Orsøkin er, at ferðagjaldið 5. mai 1994 varð lækkað úr 300 kr. til 120 kr.

Grein 3: ONNUR GJØLD

Arvagjøld: 12 mió. kr.:
Landsstýrið ætlar at hækka arvagjøldini, men kortini so tey eru væl lægri enn tey, ið eru galdandi í grannalondum okkara.

Eftir uppskoti landsstýrisins verða arvagjøldini, sum víst niðanfyri:

Arvaflokkur:	1994	1995
A: Eftirkomarar	1,25 - 3 %	10 %
B: Foreldur og teirra eftirkomarar	4 - 6 %	20 %
C: Abbar, ommur og teirra eftirkomarar	7 - 9 %	30 %
D: Arvingar longur burtur í slekt o.o.	10 - 12 %	40 %
E: Stovnar, feløg o. t.	10 %	40 %

Higartil er ein partur av arvagjaldinum farin í ríkiskassan. Eftir uppskoti landsstýrisins fer alt arvagjaldið í landskassan.

Grein 5: RENTUINNTØKUR

Rentuinntøkur: 35 mió. kr.:
Rentuinntøkur landskassans eru minkaðar munandi seinastu árini, tí lán landskassans til fiskiskip í stóran mun eru løgd um til rentu- og avdráttarfrí lán, sambært løgtingslóg nr. 34 frá 4. mars 1993 um stuðul til feskfiskaflotan.

Grein 8: GJØLD FRÁ DANSKA RÍKISKASSANUM

Heildarveiting: 843,4 mió. kr.:
Heildarveitingin frá danska ríkiskassanum verður 826,1 mió. kr. í 1994. Í teimum 826,1 mió. kr. hevur ríkiskassin mótroknað eina upphædd uppá 18,3 mió. kr. fyri ov mógv endurgjald (refusión) av almannaútreiðslum.

	eykaf. 1994	**Játtan 1995**
Heildarveiting	826,1 mió. kr.	843,4 mió. kr.
(1993)	- 18,3 mió. kr.	
	807,8 mió. kr.	

Hækkingin í 1995 til 843,4 mió. kr. stavar frá prístalshækkingum í Danmark.

VIÐMERKING TIL ÚTREIÐSLUGREINARNAR

Grein 11: LANDSFYRISITING

Landsskrivstovan:
Nýggj stýrisskipanarlóg kemur í gildi á ólavsøku 1995 og fara vit yvir til at hava ráðharrastýri á ólavsøku í 1996. Somuleiðis skal sambært ætlanunum hjá samgonguni gerast strukturrationaliseringar innan tað almenna. Landsstýrið er av teirri áskoðan, at skal skipanin fáast at virka eftir ætlan, má Landsskrivstovan styrkjast og verður tí skotið upp, at játtanin til Landsskrivstovuna verður hækkað við umleið 2 mió. kr. í 1995.

11898 Matrikulering og útskifting:
Matrikuleringin av Føroyum er um at vera liðug og nýggjar útstykkingar av føstum ognum eru ikki nógvar, so virksemið stovnsins fer at minka komandi árini. Landsstýrið kannar í løtuni møguleikarnar fyri at leggja Matrikulstovuna saman við Landsverkfrøðingsstovninum.

Grein 12: HEILSUMÁL

12109 Landssjúkrahúsið:
Innan henda játtanarkarm verður søkt um normering av einum starvi sum yviriækni á eygnadeildini og eini ráðgevaratænasta í barna- og ungdómspsykiatri.

Viðlíkahald:
7 mió. kr. eru játtaðar til betongumvælingar, innilokan av svalagongum og altanum, mála og klæða bygningar, umvæla gólv, ventilatión, umvæla pleygudeild o.a. Hesar umvælingar eru framhald av høvuðsumvælingum av øllum bygningunum á Landssjúkrahúsinum, sum byrjaðu í 1993 og sum væntandi tekur nøkur ár afturat. Kostnaðurin fyri høvuðsumvælingar 1995 til 1997 eru mettar til 37 mió. kr.

12202 Klaksvíkar sjúkrahús:
Rammusparingar verða framdar við atliti til at tillaga útreiðslurnar á rakstrarstaðnum til játtanina.

12304 Suðuroyar sjúkrahús:
Hækkingin er orsakað av, at skipað verður neyðug vaktarskipan við narkosusjúkrasystrum.

12983 Suðuroyar Sjúkrahús, ný/umbygging: 10 mió. kr.:
Út- og umbyggingin av Suðuroyar Sjúkrahúsi byrjaði í 1988 og verður væntandi liðug í 1996. Nýbygningurin er nærum liðugur og ætlanin er at fara í gongd við umbyggingina fyrst í 1995, soleiðis at alt arbeiðið verður liðugt um miðan 1996. Til liðugtgerð av út- og umbyggingini verður íløgan fyri 1995-96 umleið 19 mió. kr.

12508 Læknar:
Játtanin hækkað vegna setan av fleiri ósettum størvum og trupulleikar at fáa avloysarar, ferðaútreiðslur v.m.

Grein 13: SAMFERDSLA OG SAMSKIFTI

13265 Strandferðslan:
Strandferðslan hevur biðið um at fáa játtað 47 mió. kr. til raksturin. Landsstýrið heldur, at Strandferðslan eigur at rekast fyri 45 mió. kr.

13089 Postverk Føroya:
Landsstýrið hevur onga játtan sett av til Postverkið.

13094, 13056, 13018, 13061, 13023, 13037, Veganet, fløgur og viðlíkahald:
Landsverkfrøðingstovnurin hevur býtt sparingarnar tilsamans 6,8 mió. kr. út á ymsu rakstrarstøðini, sum stovnurin hevur mett tað vera ráðiligt.

13042: Hækkanin uppá 1 mió. kr. stavar serliga frá útreiðslum til nútímansgerð av tyrlupallunum, sum er ein treyt frá danska loft- ferðsluverkinum fyri framhaldandi almennum tyrlurakstri.

Grein 14: ÚTBÚGVING OG GRANSKING

14103 Fólkaskúlin: 130.163.000 kr.:
Karensdagarnir hava viðført, at játtanin til fólkaskúlan kann skerjast við kr. 500.000 í 1995.

14275 Fiskiídnaðarskúlin í Norðurstreymoy: 2.563.000 kr.:
Mælt verður til, at skúlin skal flytast til Klaksvíkar frá august 1995 - og samskipast við undirvísingartilboð á miðnámsstigi har á staðnum.

14205 Suðurovardeplin: 4.500.000 kr.:
Eingin upptøka av næmingum í fiskivinnu- og handilsútbúgvingum verður til skeiðárið 1995-96.

14331 Klaksvíkar HF-skeið: 1.550.000 kr.:
HF- skeiðið í Klaksvík, sum fyrisitingarliga hongur saman við Studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Eysturoy, verður flutt á Kambsdal 1. august 1995. Hetta merkir, at eingir nýggir næmingar verða tiknir inn í Klaksvík 1995.

14364 Eysturoyar Studentaskúli og HF-skeið: 10.580.000 kr.:
HF-skeiðið í Klaksvík verður flutt á Kambsdal 1. august 1995.

14414 Tekniski Skúlin í Tórshavn: 10.500.000 kr.:

Ætlanin er, at SIT- og atstøðisútbúgvingarnar verða verandi í Tórshavn. Av lærlingaútbúgvingunum vera timbur-, maskin- og el- fakið framvegis í Tórshavn. Aðrir handverkslærlingar verða í neyðugum vavi at fara til Danmarkar at fáa neyðuga skúlaútbúgving - teirra millum lærlingar í bilfakinum og í frisørfakinum.

14898 Skúlaheimið við Marknagilsvegin: [illegible],000.000 kr.:
Skúlaheimið er í sera ringum standi, og [illegible]r neyðugt við stórum umvælingum, sum mett er at kosta 10 mió. kr. tilsamans. A[illegible]eiðið er í gongd, og brúktar eru 1,75 mió. kr. í 1994.

Føroya Maskinskúli kr. 4,2 mió. kr.:
Til fløgu í samband við keyp og umbygging av ognini matr. nr. 1340e, Tórshavn til maskinskúla verða í 1994 brúktar 5 mió. kr. til keyp, projektering og útbjóðing. 4.2 mió. kr. er sett av til umbyggingararbeiðið, sum byrjar fyrst í komandi ári, og verður liðugt í aprfl 1995.

14554 Fróðskaparsetur Føroya: 9.100.000 kr.:
Sparingin, 1,2 mió. kr., má fáast til vega á tann hátt, at und- ívísingin á søgu- og samfelagsdeildini og náttúruvísindadeildini verður skerd soleiðis, at nýggir studentar ikki verða tiknir inn á nevndu deildir í 1995. Samsvarandi hesum verður størri dentur at leggja á gransking á deildum setursins sum heild. Setrið verður sjálvt at meta um, í hvønn mun undirvísingin á Føroyamálsdeildini skal skerjast.

14592 Biofar projektið: 650.000 kr.:
Hækkingin, kr. 200.000,-, letur upp fyri øðrum fíggjarveitingum.

14739 Ymiskt: 1.085.000 kr.:
Hækkingin 625.000,- skyldast arbeiðunum við lærugreinakunngerðunum til nýggju studentsútbúgvingina.

14758 Útgerð: 3.000.000 kr.:
Talan er um eina hækking, men at hækkingin kann haldast innan fyri nevndu karmar kemur av, at undirvísingin í Tekniska Skúlanum í Tórshavn verður skerd í stóran mun. Sbr. omanfyri - viðmerking- in til Tekniski Skúlin í Tórshavn.

14777 Prøvtøkur: 3.045.000 kr.:
Talið á uppgávum, sum verða gjørdar í Føroyum, er vaksandi.

14901 Útbúgvingarstuðul: 45.500.000 kr.:
Játtanin til útbúgvingargrunnin, sum skuldi verið 47,0 mió. kr. í 1995 um allar stuðulsskipanir hjá Stuðulsstovninum vóru óbroyttar, verður lækkað við 1,5 mió. kr. Broytingar skulu gerast í ferðaískoytinum til lesandi føroyingar uttanlands. Ein møguleiki er, at tey í staðin fyri eina peningaupphædd fáa ein ókeypis flogferðaseðil aftur og fram. Neyðugt er at broyta kunngerð um ískoyti nr. 142 frá 11. desember 1990.

Grein 15: MENTAN

Føroya Fornminnissavn, íløga: 1.340.000 kr.:
Til íløgu í samband við keyp og umbygging av ognini matr. nr. 1aæ í Hoyvík verða í 1994 brúktar kr. 3.280.000,- til keyp og umbygg- ing og restupphæddin kr. 1.340.000,- verður brúkt í 1995 til um- byggingina.

15907 Ymiskir studningar
323236 Listasøvn: 1.500.000 kr.:
Leiðsla listasavns Føroya ger vart við, at tað ber ikki til at reka savnið fyri eina minni upphædd. Raksturin 1993 vísir undirskot.

15983 Føroya Náttúrugripasavn, viðlíkahald:
Bygningurin á Debesartrøð (Gamla Bókasavnið).
Er í vánaligum standi og treingir til ábøtur.

15997/323236 Listasavnið (íløgur): 1.210.000 kr.:
Hetta er seinasti parturin av teirri upphædd, sum landsstýrið hevur bundið seg til at játta í sambandi við útbyggingina av listasavninum.

(Nýtt rakstrarstað) Íløgustudn. til kirkjur og mentanarbyggingar: 2.000.000 kr.:
Í 1993 vórðu kr. 20.000.000,- setur av til endurrindan fyri meirvirðisgjald, men kirkjurnar fingu eitki av hesum tá, tí er peningur settur av til endamálið nú.

Grein 16: FISKIVINNA, SIGLING O.T.

Landsstýrið umhugsar spurningin um, hvussu tað fiskveiðieftirlitið, sum er áskett í § 33 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap skal skipast, so at allar uppgávur, eftirlit, hagtøl og veiði- og fiskiloyvisskipanin verða samskipaðar undir einari leiðslu. Uppgávan er í løtuni álagd fiskivinnustjóranum, sum ikki hevur fólk ella játtanir til at røkja uppgávuna nóg væl. Landsstýrið heldur, at við samskipan og umleggingum verður tað møguligt at loysa uppgávurnar innan fyri núverandi fíggjarkarmar hjá teimum stovnum á § 16, sum hava partar av hesi uppgávu.

16391 Havbit á Føroya Banka, 16403, Royndir innan Havbúnað og p/f Fiskaaling rakstur hava øll við aling at gera. Játtanin til p/f Fiskaaling er neyðug, tí felagið hevur havt rakstrarhall orsakað av neyðslakti vegna fiskasjúku. Landsstýrið arbeiðir við einari nýggjari skipan fyri royndarvirkseminum innan havbúnað, sum meira greitt lýsir útreiðslurnar av royndarvirkseminum.

Studningar til fiskivinnuna

19873 Inntøkutrygd:
Landsstýrið hevur lækkað hetta rakstrarstað við 8 mió. kr. frá mettu nýtsluni í 1994. Henda sparing kann røkkast við umsitingarligum broytingum og betri eftirliti.

16488 Praktiskar Fiskiroyndir:
Í samband við broytingarnar í samband við nýggju Stýrisskipanarlógina verður tekstviðmerkingin "praktiskar fiskiroyndir verða gjørdar í samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd" tikin burtur. Landsstýrið ætlar næsta ár at skjóta upp, at peningur av hesi konto kann nýtast til grindakanningar, serliga teljingar av grindahvali.

Íløgustuðul:
Játtanin fyri 1995 er sett til 60 mió. kr. Nýggjastu ábendingarnar fyri 1994 vísa, at kostnaðurin fer at verða uml. 63 mió. kr. Hendan hækking av kostnaðarmetingini fyri 1994 kemur av, at nøkur skip, vegna eigaraskifti, ikki hava fingið allan stuðulin útgoldnan fyrr enn í november. Sum dømi kann nevnast, at tveir trolarar vórðu 6 mánaðir afturút tvs. uml. 1 mió. kr. Tekin eru eisini um, at fleiri smábátar verða undir skipanini í 1995.

16449 Varðveiting av fjølbroyttum fiskiflota:
Landsstýrið arbeiðir við at seta greiðari reglur fyri nýtsluni av hesi játtan.

Tiltøk fyri alivinnuna:
Játtanin á hesum rakstrarstað er lógarbundin sambært løgtingslóg nr. 73 frá 2. apríl 1994 um íløgustuðul til alivinnuna.

16994 Fiskaaling við Áir/Skopun: 5,2 mió. kr.:
Íløgan er til Lívfiskastøðini í Skopun, sum fevnir um liðugtgerð av byggiarbeiðinum, og keyp og uppsetan av UV-vatnreinsiverki, sum upprunaliga ikki var við í íløgusetlanini.

Grein 17: LANDBÚNAÐUR

Landsdjóralæknaembætið:
Tann gamla játtanin er býtt í tveir partar vegna tess, at partur av djóralæknatænastuni er privatiseraður.

17205 Royndarstøðin, broytt til "Almennar royndir og ráðgeving":
Landsstýrið hevur samtykt, at Royndarstøðin í núverandi líki verður niðurløgd, og bygningarnir verða nýttir til at hýsa almennum og privatum stovnum og feløgum innan landbúnaðin. Heitið Royndarstøðin verður í hesum sambandi broytt til Almennar royndir og ráðgeving, og reglugerðin fyri royndarstøðina verður broytt samsvarandi.

17898 Landbúnaðarstudningar:
Játtanin á fíggjarlógini fyri grein 17 landbúnaðastudningur er lækkað við 3 mió. kr. soleiðis, at studningsupphæddin fyri fíggjarárið 1995 verður 13,5 mió. kr. í mun til 16,5 mió. kr. fyri 1994.

Kjøtstudningur er hækkaður við 1 mió. kr. soleiðis, at studningsupphæddin fyri fíggjarárið 1995 verður 2,5 mió. kr. í mun til 1,5 mió. kr. fyri 1994. Hækkingin skyldast afturbering av meirvirðisgjaldi fyri seyðakjøt til teir bøndur, sum eru MVG-

skrásettir.

Studningsupphæddirnar verða ásettar av landsstýrinum eftir tilmæli frá Jarðarráðnum.

Býtið fyri 1994 var solciðis:

Uppdyrking	2,2 mió. kr.
Stráfóður	1,2 -
Súrhoyggjabrunnar	0,5 -
Húsdýraaling	0 -
Íløgur/rentustudningur	3,4 -
Mjólk	9,0 -
Í alt	**16,5 mió. kr.**

Grein 18: VINNULÍV OG ARBEIDSMARKNADUR ANNARS

18356 Ferðaráð Føroya:
Landsstýrið heldur tað verða rætt at hækka játtanina munandi til Ferðaráðið fyri at menna ferðavinnuna í Føroyum. Landsstýrið hevur tí játtað 7 mió. kr. í 1995 ella 2,5 mió. kr. meir enn játtað í 1994.

18532 Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál:
Játtanin er hækkað til tað, sum var galdandi í 1993. Í samband við broytingarnar í nýggju stýrisskipanarlógini verður tekstviðmerkingin "Verður játtað av landsstýrinum saman við fíggjarnevndini" tikin burtur.

Kappingartillagandi tiltøk:
Til tess at minka um kostnaðarstøðið hjá vinnuni og betra hennara kappingarmøguleikar verða 7,5 mió. kr. nýttar til tess at minka ciprísin til størri vinnuvirki úr 90 oyru pr. kWh niður í 75 oyru pr. kwh.

18703 Tiltøk fyri Ung:
Játtanin er lækkað við 2 mió. kr. Roknað verður við, at arbeiðsskapandi politikkurin hjá samgonguni kemur at upp- vega henda niðurskurð.

Annars arbeiðir landsstýrið við ætlan um at nýta ein part av játtanini at stuðla, at handverksmeistarar koma at taka fleiri lærlingar.

Breyt til koyrufrálæru:
Bileftirlitið hevur víst á tørvin fyri eini breyt til koyrufrálæru fyri at kunna bøta um frálæruna til koyrikort. Ein slík breyt kann fáast til vega fyri 2 mió. kr. Tískil mælir landsstýrið til at avseta kr. 750.000. Við hesi játtan kann skjøtil setast á hesa ætlan í 1995. Um so er, at henda frálæra ikki verður givin á slíkari breyt er vandi fyri, at

koyrikort tikin í Føroyum, ikki verða góðkend í ES.

18722 Arbeiðslovsisskipanin (ALS):
Játtanin til ALS er 50 mió. kr. Henda játtan saman við aðrari fígging skuldi gjørt tað møguligt hjá ALS at veita arbeiðsleysum stuðul stóran part av 1995. Hvussu langt henda játtan røkkur, ber tó ikki til at siga enn. Men eina hylling fáa vit, tá fyrsta útgjaldið hjá ALS er goldið sambært nýggju lógini. Eisini er hetta treytað av, hvussu skjótt ætlaði arbeiðsskapandi politikkurin kemur at ávirka arbeiðsloysið. Men løgtingið fer at verða kunnað um henda spurning, so hvørt landsstýrið fær meira kunnleika til hesi viðurskifti.

Rakstrarstað 18584, Javning móti tollverju, verður broytt til Stuðul til menning av fiskivinnu á landi

18601 Heilsufrøðiliga Starvsstovan:
Játtanin til rakstrarstað 11072 Umhvørvisfyrisiting er løgd undir Heilsufrøðiligu Starvsstovuna.

Grein 19: ALMANNAMÁL V.M.

19042 Serfórsorg:
Lagt saman við rakstrarstaðið er "19441 Ymiskir forsorgarstovnar". Økingin fer partvís til at dekka fullan rakstur av Vón Virkni og rakstur av sambýli í Vági.

19208 Einkjubarnastyrkur:
Rakstrarstaðið er býtt í tvey, so at skilt verður millum veruliga einkjubarnastyrkin og forskotsrindan av barnapengum.

19301 Einkjupensjón:
Lagt saman við rakstrarstaðið er "19519 Uppískoytisveiting".

19403 Vanlig forsorg:
Rakstrarstaðið er býtt í tvey, so at skilt verður millum "vanlig forsorg" og "forsorg vegna arbeiðsloysi". Játtanin til "forsorg vegna arbeiðsloysi" er sett til 35 mió. kr. Hetta skal samanhaldast við játtanina til ALS uppá 50 mió. kr. Landsstýrið metir, at við broytingum í ALS í 1995 og nakað av øktum virksemi í samfelagnum, skuldi játtanin hildið.

19441 Ymiskir forsorgarstovnar:
Lagt saman við rakstrarstaðið "19042 Serfórsorg".

19519 Uppískoytisveiting:
Lagt saman við rakstrarstaðið "19301 Einkjupensjón".

19607 Heimarøktarskipanin:
Søkt verður um normering av einum starvi sum leiðari av samanløgdu skipanini. Innan játtanarkarmin verður eldrasambýli í Norðstreymoy sett á stovn.

19868 Føroyingar á stovni í Danmark:
Út frá upplýsingum frá donskum amtum metir Almannastovan nú, at prísurin fyri føroyingar á stovni, bústað, verkstøð og skúlar, í 1995 verður 19,1 mió. kr.
Afturat metir Almannastovan, at útreiðslan, sum donsku kommunurnar vilja krevja sum endurgjald fyri pensjónsútreiðslur til føroyingar á stovni í Danmark í 1995, kann setast til 3,5 mió. kr.

19956 Húsalánsgrunnurin:
Húsalánsgrunnurin hevur gjørt stórar burturleggingar ímóti møguligum tapi uppá lán seinastu árini. Grunnurin hevði við árslok 1993 eina eginogn uppá 87 mió. kr. Landskassin hevur í 1994 veitt grunninum 25 mió. kr., soleiðis at eginognin nú er 112 mió. kr. Landsstýrið heldur tað sostatt ikki vera neyðugt at veita grunninum nakað ískoyti til eginognina í 1995.

Hinvegin skal grunnurin gjalda munandi aftur av skuld síni í 1995, og landsstýrið heldur tað tí vera neyðugt, at veita grunninum lán uppá upptil 50 mió. kr. í 1995, so grunnurin kann svara afturgjaldsskyldur sínar í komandi ári.

1. viðgerð 8. desember 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 19. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. desember 1994 og eftir 1. viðgerð 9. desember 1994 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við:

Edmund Joensen, løgmann
og við landsstýrismenninar
Sámal Petur í Grund,
Eilif Samuelsen,
Ivan Johannesen,
Óla Jacobsen,
Andrias Petersen og
Jóannes Eidesgaard.

Harumframt hava fundir verið við:

Rektaran á Fróðskaparsetri Føroya,
Stýrið fyri Tekniska Skúla í Tórshavn,
umboð fyri Heilbrigdið,
umboð fyri ÍSF,
stjóran á SEV, stjóran á Húsalánsgrunninum,

stjóran í Landsbankanum,
umboð fyri sjúkrakassarnar,
Toll- og skattstovu Føroya og
Føroya Gjaldstovu.

LANDSSTÝRIÐ

Á fundum við landsstýrismenninar hevur fíggjarnevnin lagt stóran dent á at lýsa tær einstøku greinarnar á fíggjarløgtingslógini, so neyvt sum gjørligt. Hvør einstøk grein er gjøgnumgingin og landsstýrismenninir hava givið fíggjarnevndini meiri útgreinaðar upplýsingar um tey einstøku rakstrarstøðini. Teir hava eisini svarað spurningum frá fíggjarnevndarlimunum.

Viðvíkjandi inntøkum landskassans í 1995.

Landsbankastjórin upplýsti, at lønarútgjaldingarnar í oktober og november mánaða í 1994 eru størri enn lønarútgjaldingarnar í oktober og november mánaða í 1993. Samlaðu lønarútgjaldingarnar seinastu 12 mánaðirnar eru tó lækkaðar við 2-3%. Tað er serliga í sambandi við fiskivinnuna á sjógvi og landi at lønarframgongd kann staðfestast. Tær almennu lønirnar eru minkaðar við uml. 2%. Innanfyri bygging og ídnað er lønarafturgongdin uml. 7% og innanfyri tænastuvirksemi er lønarafturgongdin uml. 8%. Harafturímóti er lønarvøksturin í fiskivinnuni uml. 14%. Landsbankastjórin upplýsti, at eingin orsøk er at rokna við, at lønarinntøkurnar verða lægri í 1994 enn tær vórðu settar til, men hann kann ikki siga um talan verður um ein lønarvøkstur. Ein ávís ábending er eisini um, at innflutningurin er í vøkstri.

Uppá fyrispurning frá fíggjarnevndini upplýsti **landsbankastjórin** at uml. helvtin av lánsbrøvunum, ið eru seld, eru keypt av føroyskum stovnum og persónum. Tað setir ikki størri krøv til eginpening hjá bankunum, at teir liggja inni við lánsbrøvum hjá landsstýrinum.

Hann helt tað vera rætt, at **Húsalánsgrunnurin** verður fíggjaður við lántøku. Grunnurin er væl fyri fíggjarliga, hann hevur nógvan eginpening. Við at fremja játtanina til Húsalánsgrunnin sum eitt lán, fastheldur landsstýrið sítt krav ímóti grunninum.

Samb. uppskoti landsstýrisins til fíggjarlóg fyri 1995 er inntøkan av vanligum landsskatti sett til 682 mió. kr.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum **Jóannes Eldesgaard**, svaraði uppá fyrispurning frá fíggjarnevndini um hví landsstýrið roknar við lægri skattainntøkum í 1995 enn í 1994, at 130 mió. kr. av skattainntøkunum í 1994 stóðust av krígspensjónum. Av tí at ein partur av hesum pensjónum eru eftirgjøld, minkar skattainntøkan í 1995 við uml. 50 mió. kr. Av hesum er landsins partur 1/3, meðan kommunanna partur er 2/3.

Uppá fyrispurning um hví inntøkan av meirvirðisgjaldi er sett til eina lægri upphædd

í 1995 enn hon var í 1994 segði **Kári Petersen**, fíggjarstjóri at hetta er ein meting hjá landsstýrinum, og at tað er vanligt við øktum innflutningi til jóla soleiðis, at tey seinastu innflutningstølini ikki geva nakra orsøk til at halda at samlaða inntøkan av meirvirðisgjaldi skal verða hægri í 1995 enn hon var í 1994.

Uppá fyrispurning viðv. teimum trupulleikum, ið kunnu standast av kvotaskipanini í januar mánaða 1995, segði **Jóannes Eidesgaard**, at ein kann ikki vera annað enn samdur við fíggjarnevndini í, at hetta kann verða ein trupulleiki í sambandi við meting av inntøkugrundarlagnum.

Rentuskatturin í 1994 var 44 mió. kr. Í 1995 eru inntøkurnar av rentuskattinum ásettar til 70 mió. kr. Landsstýrismaðurin upplýsti, at grundarlagið fyri útrokningini av talinum fyri 1995 var tað, sum var komið inn í rentuskatti í juli mánaða í 1994. Um rentustøðið minkar verður inntøkan sjálvandi lægri.

Viðv. útreiðstum landskassans.
Grein 10.
Á konto 10177: Løgtingsins umboðsmaður eru á fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins avsettar 300.000 kr. í 1995. **Óli Jacobsen**, landsstýrismaður upplýsti, at upphæddin er alt ov lítil og at starvið sum umboðsmaður ikki kann setast, frá 1. apríl 1995. Fyrireikandi arbeiðið í sambandi við løgtingsins umboðsmann er ikki byrjað enn. Landsstýrismaðurin segði seg annars eingi hava ímóti, at danski umboðsmaðurin tekur sær av føroyskum viðurskiftum. Hann helt tað vera neyðugt at fáa ein kærumyndugleika, møgnliga í staðin fyri umboðsmannin, tí at sum er virka lógirnar um innlit í fyrisitingina og fyrisitingarlógin ikki.

Grein 11.
Á konto 11262: Toll- og skattstova Føroya var útreiðslan í 1994 sett til 51,454 mió. kr. Játtanin í 1995 er 51,954 mió. kr.

Á fundi við landsstýrismannin í fíggjarmálum **Jóannes Eidesgaard**, **Petur Alberg Lamhauge**, forstjóra á Toll- og skattstovuni, **Torbjørn Mikkelsen**, stjóra og **Kára Petersen**, fíggjarstjóra varð upplýst, at útreiðslurnar í Føroyum til umsiting av toll- og skattaskipanini pr. íbúgva er tann sama sum í Danmark, og at 51 mió. skuldu staðið á fíggjarlógini fyri 1993 tí, at Toll- og skattstovan fekk samsýning fyri at umsita skipanina um endurgjald fyri goymslu í sambandi við mvg skipanina. Annars upplýsti stjórin, at 500.000 kr. á rakstrarstaði 11433 eru til at keypa nýggja pc-útgerð fyri. Fleiri av maskinunum eru brendar saman. Stjórin legði dent á, at hetta hevur einki við fíggjarstýringsskipanina á gjaldstovuni at gera.

Upplýst varð, at 125 fólk starvast á Toll- og skattstovuni í dag, men at tað hevði borið til at fingið raksturin á Toll- og skattstovuni niður, um tann samlaða lóggávan, sum stovnurin umsitur, varð gjøgnumgingin við tí fyri eyga at gera lógargrundarlagið

einfaldari. Í hesum sambandi nevndi **Jóannes Eldesgaard** møguleikan at seta eina nevnd at endurskoða skattalógirnar í 1995 við tí fyri eyga, at gera tær einfaldari. Tá hesin bólkurin varð liðugur við arbeiðið, kundi hann farið undir at endurskoða mvg-skipanina við sama endamáli.

Uppá fyrispurning frá fíggjarnevndini sagði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, at útgangsstøðið fyri fíggjarlógini fyri 1995 er tað lønarstøðið, sum vit hava í dag. Landsstýrið miðar ímóti, at lønarstøðið verður óbroytt í 1995 við at gera semju við partar á arbeiðsmarknaðinum.

Á konto 11053: Landsskrivstovan var játtanin í 1994 13,65 mió. kr. Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995 er játtanin 15,5 mió. kr.
Edmund Joensen, løgmaður greiddi frá, at eingi er avgjørt enn um hvussu bygnaðurin á Landsskrivstovuni skal verða í sambandi við, at nýggja stýrisskipannarlógin verður sett í gildi í 1995. Í álitinum til nýggju stýrisskipannarlógina verður skotið upp, at landsstýrismenninir sita á teimum einstøku stovnunum. Hesum tók Løgmaður ikki undir við og helt, at allir landsstýrismenninir skulu vera samlaðir í landsstýrinum. Tosað hevur eisini verið um, at hvør landsstýrismaður skal hava sín "ministarasekretær".

Viðv. meirjáttanini hjá landsstýrinum upplýsti løgmaður, at landsstýrinum vantar arbeiðsorku á Landsskrivstovuni í sambandi við útfylling av rammulógunum, ið eru gjørdar í sambandi við avtaluna við dansku stjórnina.

Á konto 11034: Kanning av almenna sektorinum eru avsettar 2,5 mió. kr. á landsstýrisins uppskoti til fíggjarlóg fyri 1995. Løgmaður upplýsti, at landsstýrið heldur tað vera best, at ein kanning av almenna sektorinum verður gjørd av uttanfyristandandi persónum ella feløgum, og at peningurin verður settur av til hesar persónar og feløg. Upplýst varð, at hendan játtanin ikki er roknað til ta í stýrisskipannarlógini § 18 nevndu kanningarnevnd.

Viðv. lønarútreiðslunum hjá tí almenna í 1995 upplýsti **Edmund Joensen**, at lønarútreiðslurnar ikki fara at vaksa í 1995. Landsstýrið hevur ikki gjørt av, um lóggevast skal um semja ikki fæst á arbeiðsmarknaðinum, tá ið sátmálarnir fara úr gildi.

Viðv. konto 11090: Fyrisiting av undirgrund.
Á játtanini fyri 1994 eru avsettar 2,0 mió. kr. á hesi konto. Samb. uppskoti landstýrisins er játtanin fyri 1995 3,02 mió. kr. Løgmaður greiddi frá, at orsøkin til at biðið verður um økta játtan er, at inntøkurnar 1 mió. kr. hjá oljufyrisitingini fara beinleiðis í landskassan. Haraftrat brúkar stovnurin nógvan pening til ferðaútreiðslur og skeiðvirksemi. Eisini er neyðugt við serkønari hjálp á fleiri økjum.

Á konto 11604: Valuta- og prísráð. Játtanin var í 1994 913.000 kr. Á fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins fyri 1995 er játtanin 863.000 kr. Løgmaður upplýsti, at landsstýrið hevur samtykt at kanna, um tað er neyðugt við einum prísráði.

Í sambandi við grein 11 var stjórin á Almannastovuni á fundi í fíggjarnevndini. Komið varð inn á játtanina til Almannastovuna, sum í 1994 var 17 mió. kr. Játtanin fyri 1995 er sambært uppskoti landsstýrisins 18,8 mió. kr. **Bjarni Vilhelm** upplýsti, at tey fólkini, ið vórðu sett í starv samb. eykajáttanini til Almannastovuna í fjør, framhaldandi fara at starvast á stovninum.

Grein 12.
Samb. konto 12007 var játtanin til sjúkrakassarnar í 1994 15 mió. kr. og er hon óbroytt samb. landsstýrisins uppskoti fyri 1995.

Torbjørn Mikkelsen, umboð fyri sjúkrakassarnar førdi fram, at sjúkrakassarnir hava áður fingið størri refusión frá landinum. Prísurin á heilivági varð settur niður og harvið lækkaði refusiónin eisini. Meðalendurgjaldið var upprunaliga 35%, nú er tað komið niður á 24%. Torbjørn Mikkelsen upplýsti, at sjúkrakassarnir eiga lítlan og ongan pening og at teir koma at hava eitt undirskot í 1995. Teir brúka burturav eginognini. Um endurgjaldið varð sett upp til uml. 30%, høvdu sjúkrakassarnir fingið uml. 1 mió. kr., og so kundu sjúkrakassarnir upparbeitt eitt yvirskot uppá longri sikt.

Samb. uppskoti landsstýrisins er játtanin til Heilbrigdið sett niður úr 4,480 mió. kr. til 4,0 mió. kr. **Umboðini fyri Heilbrigdið** førdu fram, at játtanin til Heilbrigdið er skorin niður fleiri ferðir áður.

Um uppskotið til játtan hjá landsstýrinum verður veruleiki, verður neyðugt at siga trimum fólkum upp, sum hava uml. 4 mór. uppsagnarfreist. Umboðini mettu ikki, at Heilbrigdið kann klára seg við minni enn 4,5 mió. kr. um árið. Avdráttartíðin fyri lánini í bygninginum hjá Heilbrigdinum ganga yvir 10-15 ár. Teir skylda uml. 2,3 mió. og umhugsa at leingja lánini.

Á fundi við **Andrias Petersen**, landsstýrismann. **Johnny Winther Holbech**, stjóra á almanna- og heilsudeildini í Tinganesi og **Høgna Joensen**, sjúkrahússtjóra varð upplýst, at játtanin viðv. útreiðslum til Ríkissjúkrahúsið er hækkað við eini hálvari millión, orsakað av kostnaðinum av at senda sjúklingar til Danmarkar. Skipanin er soleiðis, at avvarðandi sjúkrahús, ið sendir sjúklingin til Danmarkar, rindar kostnaðin aftur og fram og uppihald á Hotel Tórshavn. Hetta kostar, samb. **Høgna Joensen**, sjúkrahússtjóra, uml. 10.000 kr. fyri hvønn sjúkling. Uml. 800 sjúklingar verða sendir til Danmarkar um árið.

Klaksvíkar Sjúkrahús, ið samb. játtanini fyri 1994 fekk 38,364 mió. kr., fær eftir uppskoti landsstýrisins til fíggjarlóg fyri 1995, 34,964 mió. kr.. Uppá fyrispurning hví landsstýrið hevur skorið so nógv av játtanini til Klaksvíkar Sjúkrahús førdi **Andrias Petersen** fram, at landsstýrið meinar, at sjúkrahúsið í Klaksvík kann rekast fyri eina lægri upphædd enn sambært játtanini fyri 1994. Tað er ein ávísur yvirkapacitetur í sjúkrahúsverkinum, serliga innan fyri ortopædi. Í hesum sambandi hevur sjúkrahúsverkið roynt at fingið sjúklingar aðrastaðni frá, úr Grønlandi og úr øðrum londum, men er hetta ikki eydnast.

Játtanin til Landssjúkrahúsið var í 1994 207,898 mió. kr. Sambært uppskoti landsstýrisins, er játtanin fyri 1995 208,398 mió. kr. Landsstýrismaðurin varð spurdur um hvørjar ætlanir landsstýrið hevur við skúmnum hjá Landsverkfrøðinginum. **Andrias Petersen** upplýsti, at tað er sjúkrahússtýrið, ið viðger spurningin, men at sjúkrahúsið hevur fingið barakkirnar frá Landsverkfrøðinginum, og at ætlanin er at brúka tær til skrivstovur og ikki til sjúkrastovur. Ætlanin er, at tær skulu setast upp eystanfyri Landssjúkrahúsið. Men enn er eingin avgerð tikin um tær í heila tikið skulu setast upp.

Viðv. hølistrupulleikunum á Landssjúkrahúsinum førdi landsstýrismaðurin fram, at tað er nóg mikið av m^2 á Landssjúkrahúsinum. Um Matrikulstovan verður flutt til Landsverkfrøðingin, kann tann fyrisitingin hjá almannastovuni, ið nú er á Eirargarði, flyta oman á Almannastovuna. Um fólkini, ið búgva á Eirargarði, verða flutt til sambýli, kann Landssjúkrahúsið brúka bygningarnar hjá Eirargarði.

Grein 13.
Á fundi við **Sámal Petur í Grund**, landsstýrismann varð upplýst, at samb. uppskoti landsstýrisins eru 45 mió. kr. avsettar til Strandferðslu Landsins á løgtingsins fíggjarlóg fyri 1995. Víst varð á, at nakrar sparingar kunnu fremjast viðv. Bygdaleiðum í sambandi við, at aktiviteturin minkar. Samb. skjali 6.1 er játtanin hjá høvuðsfyrisitingini 15,879 mió. kr. Samb. skjali 6.4 eru lønarútreiðslurnar av hesum 8,535 mió. kr. Sámal Petur í Grund greiddi frá, at orsøkin til, at lønir eru so stórur partur av játtanini hjá høvuðsfyrisitingini er, at Strandferðslan sjálv rindar pensjónir til starvsfólkið.

Fíggjarnevndin spurdi, hvat tær 6 mió. kr., ið standa á konto 72700 í skjali 6.4, eru ætlaðar til, og varð **Sámal Petur í Grund** biðin um at gera eina útgreining viðv. hesari konto. Hesa útgreining hevur fíggjarnevndin fingið.

Á skjali 6.2 eru lønarútreiðslurnar til Smyril 11.992 mió. kr. og 6.1 mió. kr. til Teistan. **Sámal Petur í Grund** varð spurdur, hví lønarparturin hjá Smyrli er so stórur. Hann upplýsti, at 21 manns eru knýttir at Smyrli, og at ætlanin í komandi ári er, at sigla við 3 manningum knýttum at Teistanum og Smyrli. Fíggjarnevndin bað Sámal Petur í Grund kanna, hvør rindar vistir hjá manningini.

Í 1994 var játtanin hjá Strandferðsluni 37 mió. kr. Veruliga nýtslan hjá Strandferðsluni var 49 mió. kr. Fíggjarnevndin spurdi landsstýrismannin um Strandferðslan hevði søkt um eykajáttan til hesa meirnýtslu og fekk tað svar, at tað er ikki gjørt, men at tað verður gjørt innan stutta tíð.

Fíggjarnevndin spurdi um ein nú kann vera vísur í, at tær 49 mió. kr. veruliga røkka til nýtsluna hjá Strandferðsluni í 1994, ella um søkjast skal um meirjáttan.

Sámal Petur í Grund upplýsti, at Strandferðslan í 1992 og 93 hevur uppsamlað eitt hall, sum er uml. 13 mió. kr. Fíggjarnevndin bað Sámal Petur í Grund um roknskapin hjá Strandferðsluni fyri 1993 og eina frágreiðing viðv. meirnýtsluni í mun til játtanina.

Játtanin til Postverk Føroya var í 1994 3 mió. kr. Á uppskoti landsstýrisins til fíggjarlóg fyri 1995 er játtanin til Postverkið sett til 0 kr. Sámal Petur í Grund varð spurdur hvussu Postverkið ætlar at spara hesa upphædd og greiddi landsstýrismaðurin frá, at Postverkið fær eina eyka inntøku uppá 500.000,- kr. um árið fyri ALS-mánadagin. Harumframt verður 1,5 mió. kr. sparð, tí fólk, ið hava starvast á Postverkinum eru flutt av landinum og farin úr starvi. Eftir er 1 mió., og hevur Postverkið einki uppskot um, hvussu hetta skal sparast. Postverkið og Strandferðslan kunnu tó royna at samskipa koyringina og kunnu báðir stovnar tí spara eina ávísa upphædd. Støddina á upphæddini kendi landsstýrismaðurin tó ikki. Postverkið heldur, at sparast kunnu 1,5 mió. kr. uttan uppsagnir.

Viðv. Landsverkfrøðingsstovninum hevði **Sámal Petur í Grund**, landsstýrismaður við sær til fundin nýtt fylgiskjal 12 við rættaðum tølum. Samb. fylgiskjali 6.52 skal Skopunar Havn hava 3,7 mió. kr. í 1995. Landsstýrismaðurin upplýsti, at eingin sáttmáli um arbeiði fyriliggur, tá núverandi byggistig í Skopun er liðugtgjørt.

Á skjali 6.54 er 1 mió. sett av til útreiðslur til upprætting av tyrlupallum. Landsstýrismaðurin upplýsti, at hetta er krav frá dansku loftferðslu myndugleikunum.

Í sambandi við fylgiskjal 3.46 er at viðmerkja, at lønarútreiðslurnar til verkfrøðingarnar ikki koma undir lønarútreiðslurnar á fylgiskjali 3.46. Samb. skjali 3.46 eru leiguútreiðslurnar hjá Landsverkfrøðinginum 1,087 mió. kr. fyri 1995. Fíggjarnevndin spurdi landsstýrismannin um hví upphæddin er so stór og bað um nærri frágreiðing viðv. hesari upphædd.

Um samanleggingina av Matrikulstovuni og Landsverkfrøðinginum segði landsstýrismaðurin, at landsverkfrøðingurin er sera positivur hesum viðvíkjandi. Øll Matrikulstovan rúmast inni á Landsverkfrøðingsstovninum. Í 1995 kemur sparingin av at leggja stovnarnar saman tó ikki at merkjast, tí flytingin av Matrikulstovuni yvir til Landsverkfrøðingin kostar eina upphædd, ið ikki nærri er ásett enn. Upplýst varð, at nøkur fólk á Matrikulstovuni verða uppsøgd.

Fíggjarnevndin bað eisini landsstýrismannin um at greiða nærri frá upphæddini á skjali 3.46 viðv. útreiðslum til EDV-tól uppá 120.000 kr. um árið.

Grein 14.
Sambært uppskoti landsstýrisins, verður játtanin hjá Fróðskaparsetri Føroya 9,1 mió. kr. ímóti 10,3 mió. kr. í 1994. **Jóan Pauli Joensen** segði á fundi, at setrið hevur spart nógv tey seinastu árini og at reka Fróðskaparsetur Føroya í 1994 við einum útreiðslukarmi uppá 10,3 mió. kr. hevur bert kunna latið seg gjørt, við at steðga við at seta fólk aftur í leys størv.

Jóan Pauli Joensen segði, at Fróðskaparsetur Føroya skal hava umleið 10 mió. kr. um árið fyri at klára seg. Hetta merkir, at tvey full størv verða ikki sett. Harumframt taka teir so ongar næmingar upp í 1995, burtursæð frá Føroyamálsdeildini.

Eitt skrivstovustarv, eitt granskingarhjálparastarv, eitt starv sum bókavørður og eitt starv sum stipendiatur verða burturspard. Harumframt verður neyðugt hjá Fróðskaparsetri Føroya at gera aðrar sparingar.

Við at fáa umleið 10 mió. kr. ber so dánt til at halda tørn og fáa tey lesandi, sum eru innskrivaði, liðug. Samstundis kann Fróðskaparsetrið fara undir at gera møguligar strukturbroytingar á setrinum, sum gera, at setrið kann virka undir verandi fíggjarligum umstøðum.

At enda segði **Jóan Pauli Joensen**, at hann helt tað vera løgið, at Fróðskaparsetur Føroya, sum er tann einasti veruligi granskingarstovnurin í Føroyum, burtursað frá Bio-far projektinum, skal skerjast so nógv í mun til aðrar stovnar, ið eru nevndir undir grein 14 í fíggjarlógini, sum bert hava undirvísing og ikki gransking. Hann helt, at myndugleikarnir eiga at uppríoritera granskingina, serliga í sambandi við eina komandi oljuvinnu og vísti á, at granskingarstovnar hava møguleikar fyri at fáa granskingarstuðul frá ES. Fróðskaparsetrið kannar henda møguleika.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995 er játtanin hjá Tekniska Skúla í Tórshavn sett til 10,5 mió. kr. Í 1994 var játtanin hjá Tekniska Skúla í Tórshavn 11,02 mió. kr.

Stýrið fyri Tekniska Skúla greiddi frá, at samb. uppskoti landsstýrisins til játtan fyri 1995, kann skúlin bert hýsa lærlingaútbúgvingum í timbur-, maskin- og elfakinum, umframt SIT støðisár og atstøðisútbúgvingum. Stýrið segði, at aðrar handverksútbúgvingar, sum hígartil hava verið á skúlanum, verða skornar burtur og handverkslærlingar skulu í hesum sambandi sendast til Danmarkar á skúla.

Stýrið metti tað vera púra burturvið at avtaka bil- og hárfríðkannardeildir skúlans, tí hesar deildir avgjørt eiga lærlinga- og næmingagrundarlag at virka á.

Á biløkinum hava lærarar skúlans arbeitt við at dagføra lærlingaútbúgvingina soleiðis, at hon samsvarar við ta dansku. Hetta hevur so ført við sær, at eingir sáttmálar eru undirskrivaðir seinastu tíðina. Harumframt er bilfakið partur av SIT útbúgvingini og 15 SIT'arar hava valt bilinjuna til várs. Stýrið mælti tí til, at skúlin í fyrstu atløgu fær loyvi til at halda fram við fyrsta skúlaskeiði.

Um bildeildin verður stongd, hava næmingarnir bara tveir møguleikar - antin at gevast ella at velja aðrar deildir.

Teir bilmekanikaralærlingar, sum eru í gomlu skipanini, kunnu ikki halda fram á skúla í Danmark, orsakað av, at útbúgvingarskipanin er broytt so nógv í mun til okkara at samsvar ikki er ímillum útbúgvingarnar longur.

Hesir verða tí noyddir at taka alla skúlagongdina umaftur í Danmark.

Tað sama ger seg galdandi við hárfríðkannarlærlingum. Á sama hátt sum við bilmekanikarafakinum, er ætlanin at dagføra hárfríðkannarútbúgvingina.

Landsstýrismaðurin í skúlamálum **Eilif Samuelsen** og **Jákup Thorsteinsson**, stjóri á undirvísingar- og mentannardeildini í Tinganesi upplýstu, at samb. grein 14 var játtanin til fólkaskúlan í 1994 130,663 mió. kr. Samb. uppskoti landsstýrisins er játtanin fyri 1995 130,163 mió. kr. Landsstýrismaðurin greiddi frá, at næmingatalið í fólkaskúlanum er minkað javnt um alt landið. Lin til tveir næmingar eru farnir úr hvørjum flokki og tí hevur møguleiki ikki verið fyri at leggja niður nakrar flokkar. Sostatt hevur ikki verið møguligt at spara á hesum øki. Hinvegin segði landsstýrismaðurin, at av tí, at lærarar fáa hægri lønarstarvsaldur og játtanin er stórt sæð tann sama í 1995 sum í 1994, svarar hetta til eina sparing uppá eini 3%, sum skúlaruir mugu klára innanhýsis.

Viðv. konto 14136: Skúlabarnaflutningur upplýsti landsstýrismaðurin, at í fíggjarárinum 1993 varð játtanin til skúlabarnaflutning skerd við 1 mió. kr. Fyri at halda fíggjarkarmin hetta árið, varð tilskotsprosentið lækkað úr 50% niður í 30% fyri skúlaárið 1992/93. Hotta eru lógarbundnar útreiðslur, kommunurnar rinda helvtina og landið bina helvtina. Í sambandi við, at tilskotsprosentið verður lækkað úr 50% niður í 30%, hevur spurningurin stungið seg upp, um landsstýrið er heimilað til at taka eina sovorðna avgerð, og roknast kann við, at sakarmál stendst av hesum.

Viðv. Suðuroyardeplinum upplýsti **Eilif Samuelsen**, at hetta er ein liður í strukturrationaliseringini á skúlaøkinum. Tekniski skúlin í Klaksvík skal hava eina matvørulinju, og Fiskivinnuskúlin í Vestmanna skal flytast til Klaksvíkar.

Ein annar partur í strukturrationaliseringini er, at HF í Klaksvík skal flytast í Kambsdal. Landsstýrismaðurin upplýsti, at sparast kunnu umb. 50% við at flyta HF úr Klaksvík í Kambsdal. Hann upplýsti eisini, at hóast HF verður flutt úr Klaksvík, ber til at taka stakgreinar á SlT-útbúgvingini har. Hvussu nógvar stakgreinar, kundi landsstýrismaðurin ikki upplýsa.

Landsstýrismaðurin upplýsti, at HH útbúgvingin og fiskivinnuútbúgvingin í Suðuroy verða niðurlagdar, men soleiðis sum geografiska støðan er, mugu næmingarnir sleppa at gera seg lidnar har. Upplýst varð, at stjórin á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna og stjórin á Føroya Handilsskúla hava frálagt sær ábyrgdina av útbúgvingini í Suðuroy. Somuleiðis varð upplýst, at jattanin til studentaútbúgvingina í Suðuroy verður størri næsta ár av tí, at talan er um eina trý ára útbúgving og at flokkar verða tiknir inn á hvørjum ári; harvið fer næmingatalið á skúlanum at vaksa.

Viðv. hølistrupulleikum á Kambsdali í sambandi við at næmingar verða fluttir frá HF skeiðnum í Klaksvík í Kambsdal, segði landsstýrismaðurin, at honum er upplýst, at eingir hølistrupulleikar eru á Kambsdali.

Viðv. spurninginum um Tekniska Skúlan segði landsstýrismaðurin, at landsstýrið hevur samtykt at seta eitt yrkisútbúgvingarráð, ið skal verða galdandi fyri allar yrkisútbúgvingar. Sostatt verður Læruráðið umskipað og skal framefitir verða sekretariat fyri yrkisútbúgvingarráðið og lærlingalógin skal takast av. Hennara funktiónir verða ásettar í einari nýggjari yrkislóg.

Eilif Samuelsen svaraði uppá fyrispurning, at honum er upplýst, at SIT útbúgvingarnar í Føroyum samsvara við útbúgvingarnar í Danmark og verða góðkendar har.

Játtanin til Føroya Landsbókasavn var í 1994 4,25 mió. Í 1995 er játtanin sett til 4,77 mió. kr. Landsstýrismaðurin **Sámal Petur í Grund** greiddi frá, at orsøkin til hækkingina av játtanini til Landsbókasavnið er, at Landsbókasavninum tørvar hillar og at ábøtur skulu gerast. Fíggjarnevndin viðmerkti, at tílíkar játtanir skulu flytast undir fløgukontoina.

Játtanin til Landsskjalasavnið var í 1994 1,974 mió. kr. Í 1995 er játtanin samb. uppskoti landsstýrisins 2,274 mió. kr. Meirjáttanin til Landsskjalasavnið verður, á sama hátt sum meirjáttanin til Landsbókasavnið, at flyta undir fløgukontoina.

Fíggjarnevndin bað landsstýrismannin um at gera eitt yvirlit yvir teir stovnar, sum hava fingið MVG endurrindað. Hetta hevur fíggjarnevndin fingið.

Viðv. konto 323937: Graslíkisvøllir, er at viðmerkja, at 300.000 kr. eru avsettar á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995. Landsstýrismaðurin upplýsti, at Tórshavnar býráð hevur givið Argja Bóltfelag avslag uppá stuðul til graslíkisvøll á Argjum.

Sostatt kann hendan upphædd sparast.

ÍSF hevur sent fíggjarnevndini bræv viðv. fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995. Sambært uppskotinum hjá landsstýrinum verður játtanin til ÍSF tann sama, sum hon var í 1994. **Umboð fyri ÍSF** bóðu á fundi við fíggjarnevndina um at játtanin verður hækkað við teirri grundgeving, at deildirnar (sersambondini) skulu hava meiri játtan. Harumframt verður biðið um eina eykajáttan uppá 300.000 kr. til at umvæla ÍSF-húsið fyri. Húsið eru samb. **Heðin Mortensen** illa farið, vindeyguni mugu skiftast út og húsið má bjálvast av nýggjum. Eisini er neyðugt at mála húsið.

Umboðini førdu fram, at um lógin um ítróttarvedding verður broytt fær ÍSF møguleika at gera samstarv við Dansk Tipstjeneste og harvið skuldi møguleiki verið fyri at fingið meira pening til føroyskan ítrótt.

Grein 16.
Á konto 16301: Vaktar- og bjargingartænastan vóru í 1994 avsettar 16,1 mió. kr. Játtanin fyri 1995 er sett til 16,1 mió. kr.

Landsstýrismaðurin **Ivan Johannesen** segði, at Fiskivinnueftirlitið ikki virkar nóg væl í løtuni. Ætlanin er, í sambandi við at nýggja stýrisskipannarlógin kemur í gildi, at leggja Fiskivinnueftirlitið og Vaktar- og bjargingartænastuna og møguliga partar av Lønjavningargrunninum saman í ein stovn.

Uppá fyrispurning fra fíggjarnevndini viðv. fylgiskjali 9.7 upplýsti landsstýrismaðurin, at Spógvin m.a. verður nýttur til at ansa eftir hummaraveiðuni undir Føroyum.

Landsstýrismaðurin upplýsti, at talið 18,5 mió. kr. á konto 16301 fyri endurskoðaðu fíggjarlógina fyri 1994 hjá Vaktar- og bjargingartænastuni er skeivt. Tað skal vera 16,1 mió. kr. og fer hetta tal at halda. Upplýst varð, at Vaktar- og bjargingartænastan fær umleið 3 mió. kr. um árið frá tryggingini og hesin peningurin er enn ikki komin fyri 1994.

Á konto 16505: Fiskaaling er samb. uppskoti landsstýrisins 1,324 mió. kr. avsett á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995.

Ivan Johannesen upplýsti, at Fiskaaling grundað á sjúku hevur havt eitt tap í 1994 uppá nakrar mió. kr. Ætlanin við Fiskaaling er, at Fiskaaling skal hvíla í sær sjálvum.

Á konto 16469: Varðveiting av fjølbroyttum fiskiflota vóru í 1994 avsettar 5,6 mió. kr. Samb. uppskoti landsstýrisins eru í 1995 avsettar 3.6 mió. Landsstýrismaðurin upplýsti, at eingin reglugerð er gjørd til hesa konto, men at skip, sum t.d. hava eygleiðara umborð fáa stuðul av hesi konto. Bert 1,4 mió. er brúkt av hesi konto í 1994, men landsstýrismaðurin roknar við, at við árslok verða uml. 3 mió. kr. brúktar.

Á konto 16488: Praktiskar fiskiroyndir eru avsettar 8 mió. kr. í 1994. Samb. uppskoti landsstýrisins eru 8 mió. kr. avsettar í 1995. Landsstýrismaðurin upplýsti, at alt verður brúkt av hesi konto og um tað er møguligt, eigur játtanin á hesi konto at verða hækkað. Hann upplýsti annars, at peningur eisini verður bókaður á hesi konto viðv. verkætlanum, ið fara fram á landi.

Á konto 16519: Fiskirannsóknarstovan vóru 6,139 mió. kr. avsettar á fíggjarlógini fyri 1994. Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995 er játtanin óbroytt. Landsstýrismaðurin upplýsti, at fiskirannsóknarstovan hevur stórt sæð ikki ráð til at rinda annað enn lønir.

Á konto 16626: Magnus Heinason vóru í 1994 settar av 6,241 mió. kr. Samb. uppskoti landsstýrisins er henda játtan óbroytt í 1995. **Ivan Johannesen** upplýsti, at við at gera felags innkeyp saman við Vaktar- og bjargingartænastuni ber helst til at reka Magnus Heinason fyri eina lægri upphædd.

Á konto 16994: Fiskaaling við Áir/Skopun vóru í 1994 settar av 10 mió. kr. Samb. uppskoti landsstýrisins er játtanin fyri 1995 5,2 mió. kr. Landsstýrismaðurin upplýsti, at upphæddin er tann seinasta, ið verður brúkt til fløgu á lívfiskastøðini í Skopun.

Uppá fyrispurning frá fíggjarnevndin viðv. fiski, ið verður sendur av landinum, svaraði landsstýrismaðurin, at mett verður at uml. 8.000 t. av fiski fara av landinum í ár. Harav eru uml. 2.000 t. frá Ljósafelli. Hann metir møguleikan fyri uttanlandssølu av fiski sum eitt kappingarelement móttvegis føroyskum fiskavirkjum. Hetta eigur at føra við sær, at føroysk virki fara at geva meira fyri fiskin.

Í sambandi við inntøkusíðuna á fíggjarlógini, spurdi fíggjarnevndin landsstýrismannin um lógin um vinnuligan fiskiskap verður broytt í 1995. Orsøkin til fyrispurningin er, at komið er fram at nógvur fiskur er at fáa í løtuni og at soleiðis sum gongdin er, eru

útlit fyri at TAC'ið verður uppbrúkt fyrst í komandi ári og kemur flotin harvið at liggja stillur frá tí at TAC-loftið er rokkið, til fyrsta september 1995. Landsstýrismaðurin svaraði, at kvotuárið í 1994 er avtalað í 1993 í samráðingum við danir. Teir vilja ikki tosa um at broyta TAC'ið. Hinvegin upplýsti hann, at í nýggju avtaluni stendur, at skipanin við TAC kann broytast longu í januar 1995. Hann var samdur við fíggjarnevndini í, at partrolararnir, útróðrarbátarnir og línuskipini koma at fiska upp kvotuna innan heilt stutta tíð og av tí, at kvoturnar verða uppfiskaðar, er inntøkugrundarlagið hjá landsstýrinum ógvuliga óvist. Avgerandi fyri um danir vilja góðtaka eina broyting í TAC'num er, at Fiskirannsóknarstovan mælir til.

At enda segði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, at alt bendir á, at fiskastovnarnir undir Føroyum eru í menning.

Grein 17.
Á konto 17307: Skógrøkt Landsins eru á fíggjarlógaruppskotinum hjá landsstýrinum avsettar 1,2 mió. kr. í 1995. Landsstýrismaðurin **Óli Jacobsen** heitti í hesum sambandi á fíggjarnevndina at mæla til, at Skógrøkt landsins fær loyvi til at seta upp til 3 næmingar á stovninum. Landsstýrismaðurin helt annars, at ov nógv var skorið á grein 17.

Grein 18.
Á fundi við SEV stjóran **Klæmint Weihe** og skrivstovustjóran **John Danielsen**, vórðu hesir spurdir um teirra áskoðan um konto 18615: Studul til kappingartillagandi endamál. Samb. uppskoti landsstýrisins verður mett, at brúktar verða 7,5 mió. kr. til tess at minka el-prísin til størri vinnuvirki, úr 90 oyrum pr. kWt niður í 75 oyru pr. kWt. Umboðini fyri SEV hava ikki tosað við landsstýrið um hetta. Hetta er ikki eitt ynski, sum SEV er komið við.

Viðv. játtanini til kappingartillagandi tiltøk.
Á hesi konto eru avsettar 7,5 mió. kr. Landsstýrismaðurin **Óli Jacobsen** greiddi frá, at hetta er peningur, ið skal endurrindast stórforbrukarum av streymi t.v.s. virkjum, ið brúka meir enn 20.000 kWt um árið og at hetta var partur av samgonguavtaluni millum flokkarnar. Uppá fyrispurning frá fíggjarnevndini segði landsstýrismaðurin tað ikki vera óhugsandi, at Føroya Fiskavirking, Havsbrún og Kósavirkið fara avstað við helvtini av hesi upphædd. Upplýst varð, at SEV umsitur skipanina.

18584: Studningur til menning av fiskivinnu á landi.
Á hesi konto eru 20 mió. kr. avsettar í 1995. Landsstýrismaðurin upplýsti, at uml. 12 av teimum 20 mió. kr. sum eisini vóru avsettar á fíggjarløgtingslógini fyri 1994, eru brúktar í ár. Hetta hongur saman við, at Føroya Fiskavirking ikki hevur fingið fígging frá bankunum, sum teir upprunaliga ætlaðu.

Tær 20 mió. kr. eru ætlaðar til: a: Íløgustuðul til verkætlanir, b: 1,25 kr. í studningi pr. kg. av innkeyptum fiski.

Óli Jacobsen segði, at tað, sum ikki er brúkt av játtanini, átti at verið flutt yvir á

játtanina til næsta ár. Orsøkin er tann, at tá ið Føroya Fiskavirking fær síni fíggjarviðurskifti í lagi, verður meira brúkt av hesi konto.

Landsstýrismaðurin upplýsti annars, at upphæddin, ið verður brúkt av hesi konto, verður brúkt samb. løgtingslóg.

Á konto 18703: Tiltøk fyri ung var játtanin í 1994 10 mió. kr. Samb. uppskoti landsstýrisins, er játtanin fyri 1995 8 mió. kr. Landsstýrismaðurin upplýsti, at uml. 9,9 mió. kr. eru brúktar av kontoini í 1994.

Á konto 18722: ALS eru avsettar 50 mió. kr. Landsstýrismaðurin upplýsti, at lánstilsøgnin frá peningastovnunum ikki stendur við longur, men, at teir vilja taka málið uppaftur um tað verður neyðugt. Hann segði, at eftir øllum at døma fer skipanin at klára seg uttan lántøku. Uppá fyrispurning um hvør skal taka lánið svaraði landsstýrismaðurin, at tríggir møguleikar eru, antin tekur landsstýrið ella ALS lánið, ella standa báðir partar fyri láninum. Spurningurin er ikki avklaraður enn.

Óli Jacobsen segði, at avlopið hjá ALS í 1994 og játtanin í 1995 kunnu røkka langt inn í 1995. Eisini segði hann, at ALS í løtuni hevur 40 mió. kr. tøkar umframt tær 50 mió. kr., ið eru avsettar á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995. Landsstýrismaðurin upplýsti, at ikki fyrrenn í mars mánaði í 1995 ber til at siga hvussu langt játtanin røkkur, t.v.s. um ráð eru til at hava fólk í skipanini alt árið 1995 samb. núgaldandi reglum.

Konto 18532: Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál.
Samb. galdandi lóg skal fíggjarnevndin góðkenna umsóknir um stuðul til ídnaðarfremjandi endamál. Í sambandi við at nýggj stýrisskipannarlóg kemur í gildi á ólavsøku í 1995, verður heimildin hjá fíggjarnevndini tikin burtur úr lógini. Fíggjarnevndin skal í hesum sambandi taka støðu til, um hetta skal gerast áðrenn stýrisskipannarlógin kemur í gildi ella um bíðast skal við møguligum lógarbroytingum í hesum sambandi til Ólavsøku 1995.

Uppá fyrispurning frá fíggjarnevndini, um landsstýrið ætlar at varðveita verandi lønarlag, svaraði landsstýrismaðurin, at landsstýrið hevur uppsagt allar sáttmálar at fara úr gildi til várs og at fíggjarlógin er grundað á teir lønarsáttmálar, sum nú eru galdandi.

Á fíggjarlógini fyri 1994 vóru 25 mió. kr. avsettar til Húsalánsgrunnin. Í 1995 er játtanin sett til 0 kr. Í staðin fyri at avseta pening á fíggjarlógina, hevur landsstýrið givið tilsøgn um at veita lán upp til 50 mió. kr. í 1995 soleiðis, at grunnurin kann svara sínum afturgjaldsskyldum í komandi ári.

Stjórin á grunninum **Jóannes Dalsgarð** upplýsti á fundi, at bann hevði ikki roknað við, at játtanin til Húsalánsgrunnin varð tikin heilt av fíggjarlógini fyri 1995 og at Húsalánsgrunnurin hevur ikki biðið um nakað lán frá landsstýrinum.

Stjórin upplýsti somuleiðis, at umleggingin av lánum í Húsalánsgrunninum í 1994 hevur

kostað uml. 20-22 mió. kr. Húsalánsgrunninum tørvar 30 mió. kr. í 1995 um grunnurin skal halda fram við sethúsaloysnum. Harumframt skal eitt lán frá Union Bank of Norway endurfíggjast, og er tað mett at kosta grunninum uml. 25 mió. kr.

Stjórin segði, at uppskot landsstýrisins fór at ávirka eginogn grunsins og at eingin avtala fyriliggur millum Húsalánsgrunnin og landsstýrið um hvussu og nær lánið skal afturrindast.

Uppá fyrispurning frá fíggjarnevndini viðv. starvsfólkaviðurskiftunum á grunninum upplýsti stjórin, at arbeiðsuppgávan hjá starvsfólkunum er øðrvísi í dag, enn hon hevur verið. Í dag er uppgávan hjá starvsfólkunum fyrst og fremst at fylgja við um lánini verða yvirhildin/afturgoldin. Harumframt er uppgávan hjá starvsfólkunum at gera nýggjar loysnir fyri sethúsaeigaramar. Stjórin metti, at um grunnurin skal spara á starvsfólkaøkinum, mugu tað fyrst og fremst verða metingarmenninir, sum verða uppsagdir. Hesir hava tó eisini uppgávur í sambandi við bjálvingarstuðulsgrunnin og MVG endurgjaldsskipanina. Grunnurin fer at taka støðu til talið av metingarmonnum innan fyri heilt stutta tíð.

At enda gjørdi stjórin vart við, at grunnurin er verri fyri nú, tá ið hann skal út at læna pening, av tí at teir missa játtanina á fíggjarlógini. Kreditorarnir vilja ikki góðtaka, at eitt lán frá landsstýrinum fær framhjáraett framum lán frá øðrum kreditorum.

Grein 19.
Konto 19106: Avlamispensjón.
Játtanin til avlamispensjónir fyri 1994 var 110,4 mió. kr. Fyri 1995 er uppskotna játtanin 115,650 mió. kr. **Andrias Petersen** greiddi frá, at orsøkin til hækkingina er, at tað er lættari at fáa pensjón í dag. Harumframt flyta fólk, sum í dag búgva á stovni, út í sambýli og harvið fáa tey pensjón í mun til, at tey higartil bert hava fingið lummapengar. Hendan broyting hækkar útreiðslurnar til avlamispensjón við uml. 2 mió. kr.

Konto 19075: Røktarheim.
Viðv. røktarheimunum var játtanin í 1994 69,5 mió. kr., og er hon óbroytt í uppskoti landsstýrisins til fíggjarlóg fyri 1995. **Andrias Petersen** upplýsti, at ætlanin er at seta nýggjan leiðara á heimarøktarskipanini fyrst í komandi ári. Heimarøktarskipanin fer eisini at fevna um heilsu- og heimasjúkrasystraskipanina og heimahjálpina.

Konto 19868: Føroyingar á stovni í Danmark.
Játtanin á hesi konto var í 1994 20,3 mió. kr. Samb. uppskoti landsstýrisins verður játtanin hækkað til 22,6 mió. kr. Upplýst varð, at orsøkin til, at játtanin verður hækkað er, at teir føroyingar, sum búgva á stovni í Danmark flyta av stovninum út í sambýli og fáa tí rætt til pensjón.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Í **meirilutanum** eru Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariasen, Kristian Magnussen og Finnbogi Ísakson. Eisini eru tveir minnilutar: Anfinn Kallsberg og Tordur J. Niclasen.

Ein treyt fyri, at fíggjarnevndarlimur Tjóðveldisfloksins er við í meirilutatilráðingini er, at um inntøkur landskassans verða størri fyrsta ársfjórðing 1995 enn mett, verður fíggjarlógin endurskoðað í hesi tingsetuni, við tí endamáli at seta meira pening av til arbeiðsskapandi virksemi. Umboðini fyri samgonguna taka undir við hesum. Annars hevur Finnbogi Ísakson sínar egnu viðmerkingar.

Í sambandi við inntøkurnar mælir meirilutin til, at vanligi landsskatturin, hóast inntøkutøl frá 17. desember 1994 benda á ein ávísan vøkstur, ikki verður hækkaður.

Meirilutin hevur fingið trygd fyri, at metingin av MVG-inntøkuni fyri 1994 fer at halda og at innflutningstølini geva eina ábending um lítlan vøkstur. Út frá hesum heldur meirilutin, at inntøkumetingin hjá landsstýrinum, sum er 502,5 mió. kr., er í lægra lagi. Meirilutin mælir til, at hækka hesa upphædd við 7,5 mió. kr. soleiðis, at MVG fyri 1995 fer at geva landskassanum tað sama sum í 1994, t.v.s. 510 mió. kr.

Meirilutin hevur fingið at vita, at landsstýrið fer at leggja uppskot fyri løgtingið um at lækka skrásetingargjaldið á motorakførum og mett verður, at hetta, saman við vaksandi tørvi fyri at skifta út bílar, fer at økja um søluna í tílíkan mun, at landskassin fær eina meirinntøku av hesum gjaldi, og metir meirilutin, at henda meirinntøka verður 4 mió. kr.

Meirilutin er somuleiðis vitandi um, at skattanevndin í sambandi við uppskot landsstýrisins um økt arvagjald ætlar at mæla til broytingar, sum føra við sær, at meirinntøkan ikki verður 10 mió. kr., men 7 mió. kr. Meirilutin setir fram broytingar-uppskot samsvarandi hesum. Tað merkir, at inntøkan av arvagjøldum ikki verður 12 mió. kr. men 9 mió. kr.

Grein 10.

Meirilutin mælir til at hækka játtanina til grein 10: Løgtingið, við 750.000 kr.

Meirilutin vísir til semjuna, sum varð gjørd í samgonguskjalinum og har sagt verður: "Við heimild í grein 18 í stýrisskipannarlógini verður sett nevnd at ganga ígjøgnum og kanna møgulig óreglulig viðurskifti í umsitingarligum og politiskum avgerðum, og verður kanningin løgd fyri løgtingið at taka støðu til". Meirilutin mælir til, at játtaðar verða 500.000 kr. til hetta endamál.

Nýggja tingskipanin verður sett í gildi á Ólavsøku í 1995. Tann broytta tingskipanin setir slík krøv til nevndararbeiðið í løgtinginum, at neyðugt verður hjá nevndunum í størri mun enn higartil at taka sær serkøna uttanhýsis hjálp. Fyri fíggjarárið 1995 mælir meirilutin til, at 250.000 kr. verða fingnar til vega við serstakari játtan. Í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 1996 eigur formansskapurin í løgtinginum at meta um

annaðhvørt løgtingið skal halda fram við at nýta uttanhýsis serkøna hjálp ella um løgtingsskrivstovan til ta tíð skal hava eina normering.

Undir grein 11: Landsfyrisitingin, rakstrarstað 11262 mælir meirilutin til, at játtanin verður hækkað við 300.000 kr. Meirjáttanin skal nýtast til at útvega nýggjan eftirlitshund til tollvaldið. Eisini mælir nevndin til, at játtanin til rakstrarstað 11466: Fíggjarstýringsskipan v.m. verður hækkað við 2,6 mió. kr. til 7 mió. kr. Meirilutin heldur tað vera at stórum týdningi, at tey, sum skulu umsita og arbeiða eftir nýggju fíggjarstýringsskipanini, fáa rímiligt innlit í hesa skipan áðrenn hon verður tikin í nýtslu.

Grein 12, meirilutin mælir til, at konto 12007: Sjúkrakassar verður hækkað við 1 mió. kr.

Endurgjaldið til sjúkrakassarnar er sett niður úr 35% til 24%, í sambandi við, at játtanin í 1994 varð lækkað við uml. 2 mió. kr. Hetta førir við sær, at sjúkrakassarnir nýta burturav eginognini við tí úrsliti, at teir um stutta tíð koma í álvarsligar fíggjarligar trupullcikar.

Meirjáttanin skal eisini forða fyri, at fólk, orsakað av fíggjarligari trongstøðu og lækkaðum tilskoti frá sjúkrakassanum skulu aftra seg við at fara til vanligan lækna, tannlækna, serlækna o.a.

Viðv. konto 12202: Rakstur og viðlíkahald, Klaksvíkar sjúkrahús, tekur meirilutin undir við at sparingar verða framdar, men mælir til, at farið verður hóvligari fram, enn landsstýrið hevur skotið upp. Uppskot meirilutans er at rakstrar- og viðlíkahaldskontoirnar verða lækkaðar við ávikavist 500.000 og 200.000 kr. í mun til játtanina í 1994.

Fyri at tryggja sama virksemi á viðgerðarstovninum Heilbrigdið mælir meirilutin til, at játtanin á rakstrarstaði 12907 konto 303243: Upplýsing/viðgerð av rúsdrekkamisnýtarum verður hækkað við 400.000 kr.

Viðv. rakstrarstaði 12983/303816: Suðuroyar Sjúkrahús, verður játtanin lækkað við 2 mió. kr. Uppskotna játtanin er ætlað til liðugtgerð av nýggja bygninginum og til umbygging av tí gamla. Landsstýrið gongur út frá, at alt arbeiðið verður liðugt á sumri 1996, men meirilutin heldur, at umbyggingararbeiðið eigur at verða gjørt soleiðis, at tað verður liðugt við árslok 1996.

Meirilutin heldur tað vera av stórum týdningi fyri syðru helvt av Suðuroynni, at strandfaraskipið Teistin, umframt at sigla á Drelnes eisini siglur á Vág. Meirilutin heldur, at skipið skal sigla á Vág tveir túrar um vikuna og út frá hesum verður mælt til, at játtanin á rakstrarstaði 13265 Strandfaraskip Landsins verður hækkað við 1 mió. kr.

Fylgiskjølini til rakstrarstað 13265: Strandferðsla Landsins vísa at tríggjar farleiðir hjá

Strandferðsluni hava avlop. Talan er um farleiðirnar um Leirvíksfjørð, Vestmannasund og Skopunarfjørð. Avlopið er ávikavist 4,5 mió. kr., 3 mió. kr. og 1 mió. kr. Meirilutin heldur, at ein ov stór skerjing í túratalinum á hesum farleiðum kann lækka inntøkurnar so nógv, at hetta ávirkar avlopið tann skeiva vegin. Meirilutin mælir tí til, at landsstýrið áleggur Strandferðsluni at kanna hesi viðurskifti við øktum túratali fyri eyga.

Meirilutin er av teirri fatan, at ætlanin var, at játtanin til Postverkið stigvíst skuldi setast niður til 0 kr. soleiðis, at hon fyrst varð sett niður til 3 mió. og síðani niður á 1,5 mió., fyri at enda at koma niður á 0 kr. í 1996. Fíggjarnevndin er kunnað um, at Postverkið í 1995 fær eina eykainntøku uppá 500.000 kr. Út frá hesum mælir meirilutin til, at játtað verður 1 mió. kr. á fíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at tillagingarnar verða sum upprunaliga ætlað.

Við støðuni í syðru helvt av Suðuroynni í huga, mælir meirilutin til, at játtanin á rakstrarstaði 13018: Størri ábøtur, vegastokkur, verður hækkað við 1 mió. kr. Meirilutin hugsar her um vegastrekkið Vág - Lopra.

Meirilutin mælir til, at játtanin til Klaksvíkar Sjóvinnuskúla verður hækkað við 50.000 kr. Meirjáttanin verður at nýta við tí fyri eyga at geva næmingunum á sjóvinnuskúlanum hollan kunnleika í trygd á sjónum.

Í sambandi við rakstrarstaði 14331: HF í Klaksvík, hevur landsstýrið ætlanir um at flyta HF næmingar úr Klaksvík til skúlan á Kambsdali. Í skrivi til fíggjarnevndina hava næmingarnir á HF í Klaksvík víst á, at fleiri trupulleikar eru í sambandi við, at næmingarnir skulu gera seg lidnar á Kambsdali. Meirilutin mælir til, at landsstýrið kannar møguleikarnar fyri, at hesir næmingarnir gera seg lidnar í Klaksvík, t.d. á Tekniska Skúlanum.

Annars tekur meirilutin ikki støðu til tær skúlapolitisku broytingarnar í viðmerkingunum hjá landsstýrinum til fíggjarlógaruppskotið. Meirilutin heldur ikki, at slíkar bygnaðarbroytingar í skúlaverkinum, eiga at verða viðgjørdar í sambandi við eina fíggjarlóg.

Meirilutin í fíggjarnevndini heldur, at Tekniski Skúli í Havn eigur at fáa 1,5 mió. kr. aftrat tí játtan, sum landsstýrið hevur skotið upp. Grundgeving meirilutans fyri hesum er, at forða verður fyri, at ung fólk, sum kunnu fáa útbúgving heima, verða send av landinum. Meirilutin er vitandi um, at ávísir samstarvstrupulleikar hava verið á Tekniska Skúla í Tórshavn og hava hesir tarnað menningini av skúlanum. Meirilutin mælir landsstýrinum til skjótast gjørligt at fáa bygnaðarviðurskiftini í rættlag.

Meirilutin ásannar, at tað hevur verið ein stór afturgongd í møguleikunum hjá ungum fólki at koma í handverkslæru. Fyri at bøta um hesi viðurskifti heldur meirilutin, at tað er neyðugt at fremja tiltøk, sum gera tað lættari hjá handverksmeistarum at taka fólk í læru. Meirilutin heldur, at gamla lógin, sum veitti handverksmeistarum endurgjald av lønini hjá lærlingum meðan teir ganga í skúla við 50% eigur at verða sett í gildi aftur, tó soleiðis, at endurgjaldið verður 75%, og at stuðulin eisini fevnir um lærlingar, ið

ganga á Føroya Handilsskúla. Út frá hesum skjýtur meirilutin upp, at játtanin til Føroya Læruráð verður hækkað við 1,1 mió. kr., sum skipanin verður mett at kosta.

Í uppskoti sínum hevur landsstýrið skert játtanina til Fróðskaparsetur Føroya við 1,2 mió. kr. Meirilutin vísir á, at stovnurin hevur verið fyri stórum skerjingum seinastu árini og tí kann meirilutin ikki taka undir við at Fróðskaparsetrið skal spara 1,2 mió. kr. í 1995.

Fíggjarnevndin er vitandi um, at um skerjingin verður so stór, kann hetta føra til, at stovnurin ikki fær røkt tær skyldur, honum eru álagdar. Út frá hesum mælir meirilutin til, at rakstrarstað 14554 verður hækkað við 600.000 kr.

Í sambandi við umvælingarnar á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin er meirilutin stórliga í iva um annaðhvørt tað er rætt ella ikki, at nýta so nógvan pening til umvælingar av hesum bygningi. Samb. viðm. hjá landsstýrinum fer hetta umvælingararbeiðið at kosta tils. 10 mió. kr. Spurningurin er, um tað ikki hevði verið rættari at útvega annan bygning til endamálið. Fyribils vil meirilutin mæla til, at játtanin til umvælingarnar av Skúlaheiminum á Marknagilsvegnum verður skerd við 1 mió. kr. Um landsstýrið finnur nakra aðra loysn heldur enn at fremja hetta umvælingararbeiði, ber til hjá landsstýrinum við góðkenning frá fíggjarnevndini, at flyta tær 3 mió. kr., sum nú eru eftir.

Í játtanini til Føroya Landsbókasavn grein 15, rakstrarstað 15109 er ein útreiðsla til keyp og uppseting av nýggjum hillum tald við í rakstrarútreiðslurnar.

Fyri at tryggja at slíkar serstakar útreiðslur í einum ári, ikki verða tiknar við aftur komandi fíggjarár, heldur meirilutin, at tær eiga at verða tiknar av rakstrarkontoini og settar á serstaka konto (viðlíkahald/fløgur).

Sostatt mælir meirilutin til, at játtanin til rakstur av Landsbókasavninum uppá 4,77 mió. kr. verður lækkað við 520.000 kr. - og at hesar verða fluttar undir viðlíkahald.

Somuleiðis mælir meirilutin til, at játtanin til Landsskjalasavnið, rakstrarstað 15304 verður lækkað við 300.000 kr. og flutt undir viðlíkahald/fløgur.

Á fundi við fíggjarnevndina, hava umboð fyri ÍSF greitt frá, at húsið hjá felagnum í Gundadali er í sera vánaligum standi og at tørvur er á at gera umvælingararbeiði fyri uml. 300.000 kr. Vísandi til, at vit í stóran mun luttaka í millumtjóða ítrótti og í tí sambandi ofta fáa gestir uttaneftir og at ÍSF-húsið er karmur um hesar vitjanir, heldur meirilutin, at eitt slíkt hús eigur at vera í hampiligum standi. Út frá hesum mælir meirilutin til, at játtaðar verða 300.000 kr., sum verða settar á nýtt rakstrarstað sum stuðul til umvæling av ÍSF-húsinum.

Meirilutin ásannar, at meirvirðisgjaldið á landbúnaðarvørum hevur rakt landbúnaðin sera meint, og tí heldur meirilutin, at ein skerjing í landbúnaðarstuðlinum beint nú, er í størra lagi. Meirilutin skjýtur tí upp, at hækka játtanina við 1 mió. kr.

Á fíggjarlógini fyri 1994, eru 20 mió. kr. játtaðar til stuðul til menning av fiskivinnu á landi. Fíggjarnevndin er vitandi um, at bert 12 mió. kr. av hesi játtan eru nýttar í hesum árinum. Vísandi til, at nýggjur grunnur við 200 mió. kr. er settur á stovn, at vit hava fingið lóg um ábyrgdargrunn, ið eigur 25 mió. kr. og lóg um framtaksfelag, heldur meirilutin tað vera ráðiligt at uppskotna játtanin fyri 1995 uppá 20 mió. kr. verður skerd við 1 mió. kr.

Meirilutin er vitandi um, at raksturin hjá SEV hevur givið góð úrslit seinastu árini, og at avlopið í 1995 aftaná rentur og avskrivingar verður millum 10 og 11 mió. kr. Út frá hesum heldur meirilutin, at elfelagið hevur grundarlag fyri at lækka prísin. Tí mælir meirilutin til, at uppskotna játtanin til kappingartillagandi tiltøk undir grein 18 verður skerd við 2,5 mió. kr. Hetta merkir, at el-prísurin, orsakað av hesum, kann verða lækkaður úr 90 oyrum pr. kWt til 80 oyru pr. kWt.

Viðv. rakstrarstaði 19042: Serforsorg, heldur meirilutin ikki, at grundarlag er fyri at bækka hesa játtan við 1,5 mió. kr., vísandi til at búfólkini eru flutt, ella flyta av ymsum stovnum í búfelagsskap. Almannaverkið sparir í hesum sambandi útreiðslur, ið vit áttu at sæð aftur í fíggjarlógini, men so er ikki, og tí skjýtur meirilutin upp, at játtanin verður uml. tann sama sum í 1994.
Vísandi til frammanfyri standandi upplýsingar og viðmerkingar, setir meirilutin fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstyrisins

1)	Grein 2, Toll-, nýtslu og framleiðslugjøld Rakstrarstað 2022: Meirvirðisgjald verður sett til	kr. 510.000.000
2)	Rakstrarstað 2713: Skrásetingargjald verður sett til	kr. 10.000.000
	Greinin verður sett til	kr. 838.600.000
3)	Grein 3, Onnur gjøld Rakstrarstað 3204: Arvagjøld verður sett til	kr. 9.000.000
	Greinin verður sett til	kr. 13.700.000
4)	Løgtingið	

	Undir grein 10 verða settar 500.000 kr. til kanning av umsitingarligum og politiskum avgerðum.	
5)	Undir grein 10 verður sum nýtt rakstrarstað sett: "Tænastuveitingar fyri løgtingsnevndir"	kr. 250.000
	Greinin verður sett til	kr. 17.353.000
6)	11262 Toll- og skattstova Føroya verður hækkað við 300.000 kr. og sett til	kr. 52.254.000
7)	11466 Fíggingarstýringarskipan v.m. verður lækkað við 2,6 mió. kr. og sett til	kr. 7.000.000
	Greinin verður sett til	kr. 152.258.000
8)	12007 Sjúkrakassar verður hækkað við 1 mió. kr. og sett til	kr. 16.000.000
9a)	12202 Klaksvíkar Sjúkrahús verður hækkað við 2,9 mió. kr. til	kr. 37.864.000
9b)	Klaksvíkar Sjúkrahús, viðlíkahald verður lækkað við 200.000 kr. og sett til	kr. 500.000
10)	12907/303243 Upplýsing/viðgerð av rúsdrekkamisnýtarum verður hækkað við 400.000 kr. og sett til	kr. 9.900.000
11)	12983/303816 Suðuroyar Sjúkrahús, nýb. verður lækkað við 2 mió. kr. og sett til	kr. 8.000.000
	Greinin verður sett til	kr. 353.615.000
12)	13265 Strandferðsla Landsins verður hækkað við 1 mió. kr. og sett til	kr. 46.000.000
13)	13089 Postverkið verður sett til	kr. 1.000.000

14)	13018 Størri ábøtur, vegastokkur hækkað við 1 mió. kr. og sett til	kr. 3.200.000
	Greinin verður sett til	kr. 154.150.000
15)	14326 Klaksvíkar Sjómansskúli (Sjóvinnuskúlin) verður hækkað við 50.000 kr. og sett til	kr. 2.399.000
16)	14414 Tekniski Skúlin í Tórshavn verður hækkað við 1,5 mió. og sett til	kr. 12.000.000
17)	14428 Læruráð Føroya verður hækkað við 1,1 mió. kr. og sett til	kr. 4.094.000
	Viðm. Landsstýrið leggur uppskot fyri tingið um broyting av grein 4, stk. 1 í Lærlingalógini so endurgjaldið til handverksmeistarar verður hækkað úr 50% upp í 75%.	
18)	14554 Gransking/Fróðskaparsetur Føroya verður hækkað við 600.000 kr. og sett til	kr. 9.700.000
19)	Undir grein 14 Skúlaheimið við Marknagilsvegin verður lækkað við 1 mió. kr. og sett til	kr. 3.000 000
	Greinin verður sett til	kr. 376.392.000
20)	Av rakstrarst. 15109: Føroya Landsbókasvn, verða fluttar 520.000 kr. til fløgur.	
21)	Av rakstrarst. 15304: Landsskjalasavn, verða fluttar 300.000 kr. til fløgur.	
22)	Undir grein 15 verður sum nýtt rakstrarstað sett ÍSF-hús umv.	kr. 300.000
23)	Rakstrarst. 15997/323937:Graslíkisvøllir, verður sett til	kr. 0
24)	Viðmerking til grein 17: Skógrøkt	

	Landsins verður heimilað at seta upp til 3 næmingar á stovninum.	
	Greinin verður sett til	kr. 51.575.000
25)	Viðm. 18532: Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál: "verður játtað av Føroya Landsstýri eftir góðkenning av løgtingsins fíggjarnevnd"	
26)	18584 Stuðul til menning av fiskivinnu á landi verður lækkað við 1 mió. kr. og sett til	kr. 19.000.000
27)	Undir grein 18. Kappingartillagandi tiltøk verður lækkað við 2,5 mió. kr. og sett til	kr. 5.000.000
	Greinin verður sett til	kr. 114.566.000

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar:

Upp undir seinasta val vóru flestu flokkar, sum bjóðaðu seg fram, samdir um, at nú var neyðugt at steðga niðurgongdini í samfelagnum.

Stórstu vandamálini vóru og eru:

1) Tann stóra fráflytingin
2) Tað stóra arbeiðsloysið
3) Tað stóra skatta- og avgjaldstrýstið
4) Tann stóra setúsaskuldin, kommunuskuldin og uttanlandsskuldin
5) Tað manglandi lønsemið hjá tí einstaka og hjá vinnulívinum.

Úrslitið av valinum var greitt; føroya fólk vildi hava eina broyting í tí førda politikkinum.

Samráðingarnar millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin, Miðflokkin og Kr. Fólkaflokkin endaðu við, at samgonguskjalið varð góðkent og undirskrivað av 18 tingmonnum.

Hóast tann broytti, men neyðugi politikkurin var avtalaður, so gingu nervarnir fyri hjá sigursharranum á valinum í juli og kastaði hann saman við vinstravonginum í føroyskum politikki. Tað tók bert eina viku at avtala innihaldið fyri samstarvinum hjá nýggju "heimastýrissamgonguni". Hetta undrar ikki, tí málsetningurin er at "holde på det bestående". Tað verður tí ongin broyting at vænta, sum loysir høvuðsspurningarnar, sum vóru frammi undir valstríðnum upp undir seinasta val.

Minnilutin heldur tað tí vera ábyrgdarleyst at samtykkja uppskot landsstýrisins, tí tað loysir ongar trupulleikar.

Í løgtingsmáli nr. 3/1993: Fíggjarløgtingslóg 1994 vístu vit á fíggjarligu gongdina í Føroyum, og komu við uppskotum um hvussu vit kundu koma burtur úr trupulleikunum. Uppskot okkara vórðu feld.

Spurningurin er, um nøkur bót er á borði, fyri at fáa sett út í kortið tann broytta politikkin, sum er neyðugur, fyri at fáa vent gongdini. Tað er seint, fleiri ár seinni enn tað kundi verið, men vit mugu ikki gevast á hondum.

Tí eiga vit at royna einaferð enn, at sameina allar góðar kreftir til at taka tey tøk, sum neyðug eru.

Vit mugu gera eina heildarætlan; eina føroyska loysn, og fáa hana at virka sum skjótast fyri at fáa gongd á aftur búskapin.

Ætlanin kann lýsast í nakrar høvuðspartar:

1) Millumverandi ímillum landskassan og ríkiskassan.
2) Lánviðurskiftini hjá kommunum.
3) Kostnaðarstøðið, herundir
   a) Skatta- og avgjaldsstøðið,
   b) Lønarstøðið.
4) Fíggjarlógarviðurskiftini.
5) Vinnulívsbroytingar.
6) Sethúsalánsviðurskifti.

I) MILLUMVERANDI ÍMILLUM DANMARK OG FØROYAR

Sambært heimastýrisskipanina hava vit ongantíð yvirtikið ta fíggjarligu ábyrgdina.

Mangt bendir á, at vit hava sett okkum fyri stórum lánum, við harav fylgjandi rentuútreiðslum, sum ongin heimild er fyri.

Nevnast kann, at vit

1) hava felags fíggjareftirlit
2) fáa part av yvirskoti Tjóðbankans í mun til seðlaumfarið

3) hava felags valutahandil o.s.fr.

Harafturat skulu øll lán føroyinga í útlandinum góðkennast av Tjóðbankanum, og øll landskassalántøka skal góðkennast av danska fíggjarmálaráðnum.

Tað er tí skeivt at rokna rentuútreiðslur okkara, sum fíggjarlógarútreiðsla. Heldur eigur hendan at verða bókað á millumrokning við danska statin. Síðani eiga vit at reisa málið um at fáa gjørt eina uppgerð ímillum statin og landsstýrið, sum eftir øllum at døma, hevur ligið á láni síðan bardagalok í 1945.

Í hesum samráðingum eiga vit at taka við øll fíggjarlig viðurskifti Danmark og Føroyar ímillum. Fólkaflokkurin kemur seinni at leggja fram uppskot hesum viðvíkjandi.

II) LÁNIVIÐURSKIFTINI HJÁ KOMMUNUM

Støðan hjá kommununum er framvegis óbroytt; ongin avtala er fingin við lángevararnar. Hetta inniber, at kommununar framvegis mugu átýkna alt ov høgt kommunuskattaprosent. Tí má landsstýrið skunda undir, soleiðis at ein avtala kann fáast sum skjótast. Harnæst er neyðugt at fáa fram nýtt býti millum land og kommunur soleiðis, at kommununar ikki framyvir koma at hava eitt skattaprosent, sum er hægri enn 18%.

Út frá hesum verður sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður Føroya Landsstýri beinanvegin at taka upp samráðingar við kommunur, við tí endamáli at fáa nýggja kommunuskipan, sum inniber, at avgerð og ábyrgd fylgjast, at ein loysn verður funnin á tántrupulleikunum, og at funnin verður ein skipan har kommunuskattaprosentið organtíð kann fara upp um 18%.

III) KOSTNAÐARSTØÐIÐ

Kostnaðarstøðið í samfelagnum er fyrst og fremst grundað á lønarstøðið, tá ið tað snýr seg um framleiðslu av einum og hvørjum slagi. Snýr tað seg um innfluttar vørur, er prísurin uttanfrá sjálvandi avgerandi. Ein annar partur av kostnaðarstøðinum er skattatrýstið. Samspælið millum lønir og skatt og avgjøld er eyðsýnt.

Skatta- og avgjaldsstøðið

Øll eru vit samd um, at skatta- og avgjaldsstøðið í Føroyum er alt ov høgt.

Skulu vit gera okkum nakrar vónir um at stoðga burturflyting og vinna á arbeiðs-

loysinum, mugu vit fáa lønsemi í hjá tí einstaka. Sum støðan er nú, fáa heldur ikki tey við arbeiði og eini rímiligari inntøku, endarnar at røkka.

Tí er avgerandi neyðugt at lækka skattu- og avgjaldstrýstið munandi.

Fólkaflokkurin hevur ført hetta fram undan valinum og fekk eisini munandi skattalækkingar við í samgonguskjalið. Stórt spell og vanlukka fyri fólk okkara, at hetta ikki bleiv til veruleika.

Í fyriliggjandi uppskoti, skjóta vit upp at lækka skattin úr 789 mió. kr. niður í 452 mió. kr. ella ein lækkan uppá 337 mió. kr. Hetta byggir á ein beinleiðis skattalætta uppá 54 mió. kr. og gevur pláss fyri eini lønarlækking uppá 12%.

Lønarstøðið

Skulu vit gera okkum tankar um at náa málsetningin at steðga burturflytingini; at basa arbeiðsloysinum; at fáa lønsemið hjá tí einstaka, er fyrsta fyritreytin, at vit hava eitt lønsamt vinnulív. Fyritreytirnar fyri hesum eru fleiri: Góð marknaðargongd, rávøra og ikki minst eitt umkostningsstøði, sum ger, at vit eru kappingarfør við onnur bæði í dygd og prísi.

Í nøkur ár hava vit í orðaskiftinum viðgjørt nógv, hvussu vit skulu fáa lønarstøðið niður uttan at lækka reallønina. Kanningar hava verið gjørdar, og tað skilagóða í hesum hevur verið rættiliga týðiligt, men engantíð er eydnast at fáa semju um hetta, hvørki politiskt ella við fakfeløgini. Úrslitið hevur tí verið vaksandi arbeiðsloysi, vaksandi skattatrýst, partvísar tilvildarligar lønarlækkingar og harvið lækkandi reallønn.

Hevði ein ístaðin lækkað skatta- og avgjaldstrýstið, sum harvið hevði givið pláss fyri lækkan av allari løn, við hækkandi reallønn sum fylgju, hevði alt verið bíligari hjá okkum.

Vit høvdu tá fingið tann positiva útvikling, sum okkum manglar í dag, nevniliga at:

1) Fíggjarlógin minkaði.
2) Fíggjaratlanirnar hjá kommununum minkaðu.
3) Vinnulívsvirki fingu betri rakstrarúrslit.
4) Batandi kappingarføri ger, at skipini standa seg betur og tora at royna aðrar fiskimøguleikar.
5) Flakavirkini fáa meira fisk frá føroysku skipunum og fáa rakstrarligar møguleikar at keypa fremmandan fisk og viðgera hann meira við positivum dekningsavlopi.
6) Onnur vinna, handverk, handil og hjálpivinnur av ymiskum slagi fáa aftur meira at gera.
7) Av somu orsøk koma nógv fleiri í arbeiði.
8) Fleiri í arbeiði við øktari reallønn hevði økt um møguleikarnar hjá øllum handilslívinum.

9) Av tí, at arbeiðsloysið hevði minkað, kundi gjaldið til arbeiðsloysisskipanina minkað.

10) Sjálvt við lægri bruttoløunum komu landskassin og kommunurnar aftur at fáa vaksandi skattainntøkur við lægri skattaprosentum.

IV) FÍGGJARLÓGARVIÐURSKIFTI

Við einum nógv lækkaðum landsskattaprosenti - í hesum føri 12% + 54 mió. kr. - verður inntøka landskassans frá persónsskatti væl lægri 1. árið. Sum frá líður hækkar skattainntøkan aftur við óbroyttum skattaprosenti.

Við øktari keypiorku hjá fólki, fara brúksgjøldini at geva størri inntøkur til landskassan, sjálvt um vit lækka %.

Út frá frammanfyristandandi kann fíggjarlógin fyri 1995 síggja solciðis út í høvuðsbólkum, og setir minnilutin (Anfinn Kallsberg) fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Fíggjarløgtingslóg fyri 1995

Inntøkur:

1) Inntøkuskattir	452.000
2) Toll-, nýtslu og framl. gjøld v.m.	800.000
3) Onnur gjøld	11.700
4) Inntøkur av spæli	700
5) Rentuinntøkur	35.000
6) Landsfyrítøkur	13.500
7) Partur av avlopi Tjóðbankans	25.000
8) Ríkisstuðul	843.400
9) Ymsar inntøkur	1.200
	2.182.000

Útreiðslur:

10) Løgtingið	16.600
11) Meginfyrisiting	131.723
12) Uttanríkismál	1.700
Heilsumál	319.288
13) Samferðsla og samskifti	41.050
14) Útbúgving og gransking	330.393
15) Mentan	35.616
16) Fiskivinna, sigling v.m.	130.690

17) Landbúnaður	22.390
18) Vinnulív og arbeiðsmarknaður	46.889
19) Almannamál v.m.	857.163
Íbúðarmál	21.000
20) Pensjónsútreiðslur	9.090
21) Effektivar veðhaldsbindingar	19.000
27) Óvissar útreiðslur	700
Viðlíkahald	58.650
Íløgur	74.677
Lækking av kostnaðarstøði	-227.000
	1.889.619

Rentuútreiðslur 462.000

Inntøkur	2.182.500
Útreiðslur	1.889.619
Avlop	292.881
- Renta	462.000
Hall	169.119

Um uppskotið verður samtykt, verður nágreinilig útgreining gjørd ímillum 2 og 3 viðgerð.

V) VINNULÍVSBROYTINGAR

Skulu vit fáa gongd á aftur í Føroyum er neyðugt at leggja til rættis ein politikk, sum gevur vinnulívinum møguleikar at virka út frá marknaðarbúskaparligum fyritreytum. Tað mest týdningarmikla fyri vinnuna er tí:

1) Kostnaðarstøðið lækkar, og harvið kappingarførið batnar.
2) Partafelagsskatturin verður verandi á lágum støði (22%)
3) Eingi nýggj avgjøld verða løgd á vinnuna.
4) Líkinda fíggingarmøguleikar verða í framtíðini.
5) Skilagóð sanering fer fram í núverandi støðu.
6) Hildið verður fram og fast við effektiviseringar.

Tað hevur eisini stóran týdning, at møguleikar at kappast á øllum økjum eru til staðar.

Vit mugu tí sleppa av við:

- Bankamonopol
- Fiskaframleiðslumonopol
- Øll onnur monopol, bæði privat og almenn.

Fiskakvoturnar eiga at verða avtiknar. Skilagóð stovnsrøkt fæst á annan hátt, við t.d. at friða økir, legudøgum v.m.

Eisini betran av okkara marknaðaratgongd er ein týðandi liður í at lækka kostnaðarstøðið fyri okkara útflutningsvørur.

VI) SETHÚSASKULD

Fólkaflokkurin hevur havt uppskot um ein sethúsagrunn, sum skuldi rinda partar av sethúsaskuldini aftur. Hetta uppskot vann ikki frama.

Í staðin hevur Føroya Løgting samtykt uppskot um at áleggja Føroya Landsstýri at finna eina loysn fyri sethúsaeigaran, við atliti til at aktivera teir avsettu pengarnar í bankanum. Vónandi kemur uppskot hesum viðvíkjandi aftur í løgtingið ein av fyrstu døgunum. Eisini støðan hjá sethúsaeigarunum hevur týdning fyri fíggjarlógina.

Minnilutin er sannførdur um, at fáa vit ikki eina heildarættan framda, sum tekur útgangsstøði í einar føroyskari loysn, so koma vit ikki burtur úr tí kreppu, vit eru í. Okkara vón er tí, at tað sum frálíður verða fleiri og fleiri sum innsíggja, at hetta er einasta loysnin, soleiðis at hon kann setast í verk til frama fyri land og fólk.

Um frammanfyristandandi uppskot ikki vinnur frama, setur minnilutin fram hesi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 1, 1201 Vanligur landsskattur:

Vanligur skattur verður lækkaður við	40 mió. kr. til 642 mió. kr.

§ 1, 1215 Felagsskattur:

Felagsskattur verður lækkaður við	7 mió. kr. til 30 mió. kr.

Partafelagsskatturin verður lækkaður 27% til 22%.

§ 1, 1702 Rentuskattur:

Rentuskatturin lækkar við	26 mió. kr. til 44 mió. kr.

Rentuskatturin verður lækkaður úr 35% í 22%

§ 1. sett til 716 mió. kr.

§ 2, 2055 Fíggjarognaravgjald:

Fíggjarognaravgjaldið
lækkar við 26 mió. kr. til 0 kr.

Skipanin fer úr gildi 1/1 1995

§ 2, 2713 Skrásetingaravgjald

Skrásetingaravgjaldið
hækkar við 10 mió. kr. til 16 mió. kr.

Lóg um lækking av skrásetingargjaldinum verður mett at geva økta sølu, og harvið meirinntøku í landskassan.

§ 2, sett til 809,5 mió. kr.

§ 3, 3204 Arvaavgjald

Arvaavgjaldið
lækkar við 8 mió. kr. til 4 mió. kr.

Gomlu takstirnir verða framvegis í gildi, men alt gjaldið fellur til landskassan.

§ 3, sett til 8,7 mió. kr.

§ 11, 11053 Landsskrivstovan

Upphæddin
lækkar við 1,85 mió. kr. til 13,65 mió. kr.

Meirarbeiði í sambandi við stýrisskipanina, má gjaldast innafyri verandi karmar eins og á løgtingsskrivstovuni.

§ 11, 11034 Kanning av almenna sektorinum

Upphæddin
strikast við 2,5 mió. kr. til 0 kr.

Arbeiðið má gerast innanfyri galdandi fíggjarkarmar.

§ 11, 11262 Toll- & Skattstova Føroya

Upphæddin verður
lækkað við 6,954 mió. kr. til 45 mió. kr.

Tann nógv minni aktiviteturin í samfelagnum má síggjast aftur í játtanini.

§ 11, 11359 Almannastovan

Upphæddin verður
lækkað við 1,8 mió. kr. til 17 mió. kr.

§ 11, 11466 Fíggjarstýringsskipan v.m.

Upphæddin verður
lækkað við 5 mió. kr. til 4,6 mió. kr.

Íløgan eigur at tillagast fíggjarstøðuna.

§ 11. sett til 136,454 mió. kr.

§ 12, 12202 Klaksvíkar Sjúkrahús

Upphæddin verður
hækkað við 3,9 mió. kr. til 38,864 mió. kr.

Játtanin svarar til tað, ið landssjúkrahúsið og Suðuroyar Sjúkrahús hava fingið. Skulu umstruktureringar gerast, skal hetta verða sum ein partur av eini heild. Uppskot landsstýrisins er heilt óforsvarligt og ikki undirbygt.

§ 12. sett til 355,415 mió. kr.

§ 13, 13018 Nýggir vegir og brýr

Upphæddin verður
hækkað við 6,5 mió. kr. til 20 mió. kr.

Ein ávísur aktivitetur eigur at vera úti um landið soleiðis, at arbeiði, sum eru í gongd, verða viðlíkahildin, so gjørdar íløgur ikki fara fyri skeyti.

§ 13. sett til 157,650 mió. kr.

§ 14, 14331 HF í Klaksvík

Upphæddin verður
hækkað við 0.5 mió. kr. til 2,05 mió. kr.

HF-skeiðið verður verandi í Klaksvík, til øll miðnámsskúlaskipanin er endurskoðað og løgd í fastar karmar.

§ 14, 14554 Fróðskaparsetur Føroya

Upphæddin verður
hækkað við 0,9 mió. kr. til 10 mió. kr.

Landsstýrið eigur at samskipa alla gransking í Føroyum undir Fróðskaparsetrinum, gera eina prioritering og áseta eina upphædd til at nýta til hetta endamálið.

§ 14, 14689 Stuðul til musikkskúlan

Upphæddin verður
lækkað við 0,123 mió. kr. til 3,699 mió. kr.

§ 14, 14739 Ymiskt

Upphæddin verður
lækkað við 0,645 mió. kr. til 0,44 mió. kr.

§ 14, 14744 Eftirútbúgving og skeið

Upphæddin verður
lækkað við 0,45 mió. kr. til 0,4 mió. kr.

§ 14, 14758 Útgerð

Upphæddin verður
lækkað við 1,5 mió. kr. til 1,5 mió. kr.

§ 14, Viðlíkahald, skúlaheim v. Marknagilsvegin

Upphæddin verður
lækkað við 2 mió. kr. til 2 mió. kr.

§ 14, sett til 370,824 mió. kr.

§ 15, 15907/323236 Listasøvn

Upphæddin verður
lækkað við 0,5 mió. kr. til 1 mió kr.

Stuðulin verður at lata til feløgini, eisini úti um landið.

§ 15, sett til 51,075 mió. kr.

§ 17, 17898/343013 Landbúnaðarstudningur

Upphæddin verður
hækkað við 2 mió. kr. til 15,5 mió. kr.

Tað kann ikki vera rætt at lækka inntøkuískoytið til bóndirnar við 20% uttan at hava gjørt sær greitt hvønn politikk landsstýrið ætlar at reka á hesum øki. Tað eru møguleikar at lækka hesa upphædd munandi, men tá má landsstýrið hava gjøgnumført eina lóg, sum tekur hædd fyri hesi umlegging. Tí verður mælt til at hækka játtanina úr 13,5 til 15,5 mió. kr. Í 1994 vóru 16,5 mió. kr. játtaðar.

§ 17, sett til 25,123 mió. kr.

§ 18, 18703 Tiltøk fyri ung

Upphæddin verður
lækkað við 8 mió. kr. til 0 kr.

§ 18, 18722 Arbeiðsloysisskipanin

Upphæddin verður
lækkað við 50 mió. kr. til 0 kr.

Arbeiðsloysisskipanin er ein tryggingarskipan, og eigur tí ikki at hava rakstrarstað á fíggjarlógini.

§ 18. sett til 60,066 mió. kr.

§ 19, 19227 Forskotsrindan av barnap ingi
Upphæddin verður
lækkað við 2,056 mió. kr. til 0 kr.

Innkrevjing av barnapeningi eigur Føroya Gjaldstova at taka sær av.

§ 19. sett til 762,464 mió. kr.

Íbúðarmál:
19956 Húsalánsgrunnurin
Upphæddin verður
hækkað við 30 mió. kr. til 30 mió. kr.

Greinin sett til 31,5 mió. kr.

Tað er átalu vert, at landsstýrið í fíggjarlógaruppskoti sínum leggur upp til eitt politisk stríð um plasering av skúlum, uttan at hetta er sambært eina h arætlan, sum hevur fingið politiska viðgerð, og enn minni politiska undirtøku. Tí eig.. ongin skúli at verða fluttur, orsakað av eini minni játtan, og viðmerkingunum hesum viðvíkjandi á fíggjarlógini. Skal tað gerast, so eigur hetta fyrst at verða staðfest við eini politiskari avgerð.

Út frá hesum minnilutin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya Løgting staðfestir, at ongin skúli verður fluttur, grundað á viðmerkingar í tingmáli nr. 30/1994: Fíggjartøgtingslóg 1995.

Finnbogi Ísakson hevur hesar viðmerkingar: Tað fíggjarlógaruppskot, sum landsstýrið legði fram 2. desember 1994, og sum fíggjarnevndin hevur viðgjørt, prógvar, at samgongan roknar ikki við skjótum búskaparligum vøkstri næsta ár. Bæði undan valinum 7. juli í ár og síðani hava fleiri av teimum núverandi samgonguflokkunum ferð eftir ferð ført tað sjónarmið fram, at ein nýggjur politikkur kundi skapað 100-tals, kanska 1000-tals, nýggj arbeiðspláss eftir heilt stuttari tíð.

Tjóðveldisflokkurin visti bæði tá og nú, at so lætt og skjótt er tað ikki at loysa okkara samfelagsligu trupulleikar. Flokkurin er ivaleysur í, at tað ber til at fáa vend í, men ásannar eisini, at tað tekur sína tíð.

Inntøkumetingarnar á báðum fíggjarlógaruppskotunum - tí frá landsstýrinum og hesum frá fíggjarnevndini - benda á, at samgongan nú roknar við minni virksemi í 1995 enn í 1994. Her kann vísast á, at inntøka landskassans av beinleiðis skatti verður sambært gjaldstovuni uml. 20 mió. kr. størri í ár, enn mett varð á fíggjarlógini fyri 1994. Kortini roknar samgongan við somu skattainntøku sum í ár, t.v.s., at samgongan væntar eina minniinntøku uppá 20 mió. kr. næsta ár sammett við tær veruligu inntøkurnar av skatti í ár.

Fíggjarløgtingslógaruppskotið er annars grundað á verandi lønar- og skattalag, t.v.s. at ongar óyvirskoðiligar og kollveltandi broytingar við stórum lógarfestum lønarniðurskurði verða gjørdar. Hetta heldur minnilutin vera rætt.

Roknað varð við einum halli uppá uml. 215 mió. kr. í uppskoti landsstýrisins. Hallið er 213 mió. kr. í uppskotinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini. Hetta eru 47 mió. kr. minni enn roknað er við á fíggjarlógini fyri 1994, og 7 mió. kr. minni, enn landsstýrið og stjórnin samdust um á fundi 17. november 1994.

Minnilutin heldur tað vera avgerandi neyðugt at minka hallið stigvíst, men ivast í, um tað er rætt at fara niður á 213 mió. kr. í ár, tá semja er gjørd við stjórnina um 220 mió. kr. Ov bráður niðurskurður elvir til vaksandi arbeiðsloysi.

Tað hevði verið rættari at sett heldur meira pening av til almennar íløgur og viðlíkahald, 7 mió. kr. meira í lántøku og 20 mió. kr. meira í inntøku, tils. 27 mió. kr., sum í roynd og veru verða tøkar, áttu partvíst at verið nýttar til fleiri arbeiðsskapandi tiltøk og partvíst sum ískoyti til eginpening Húsalánsgrunsins.

Minnilutin vónar, at tær skipanir til frama fyri vinnuna, sum undanfarna samgonga samtykti - Ábyrgdargrunnur og Framtaksfelag -eins og komandi tiltøk á vinnuliga økinum fara at gerast haldgott støði undir vinnuligari útbygging, so fleiri arbeiðspláss fáast í framleiðsluvinnuni og á privata arbeiðsmarknaðinum sum heild. Roknast má tó við, at tað tekur sína tíð, áðrenn slíkar nýggjar skipanir geva úrslit, og tí hevði verið rættari at havt meira alment arbeiði í gongd í 1995, so at vinnan fær tíð at brúka tær nýggju skipanirnar.

Minnilutin ásannar kortini, at tær broytingar, sum meirilutin í fíggjarnevndini - samgongan og umboð Tjóðveldisfloksins - hava mælt tinginum til at samtykkja, bera tann rætta vegin og fyribyrgja, at ov nógv fólk gerast arbeiðsleys orsakað av vantandi játtanum á fíggjarlógini. Her er m.a. talan um virksemið á sjúkrahúsum, hjá landsverkfrøðinginum, á postverkinum og á skúlaøkinum.

Á hesum seinasta økinum ger fíggjarnevndin vart við í sínum áliti, at nevndin hevur ikki tikið støðu til tær skúlapolitisku ætlanir, sum landsstýrið nevnir í viðmerkingunum

til sítt uppskot. Minnilutin minnir á, at lógarbroyting krevst, um ávísir skúlar skulu flytast, og minnilutin heldur harumframt, at tingið eigur at taka støðu til ætlanina partvíst at niðurleggja skúlar.

Sum víst á frammanfyri, roknar minnilutin við, at tað verður rúmsáttari í landskassanum í 1995, enn samgongan heldur. Minnilutin hevur tí treytað sær, at um inntøkurnar í ársfjórðing 1995 benda á hetta borðið, skal fíggjarlógin endurskoðast og meira peningur setast av m.a. til fløgur og viðlíkahald.

Við hesum viðmerkingum mælir minnilutin saman við umboðunum fyri samgonguna tinginum til at samtykkja tað fíggjarlógaruppskot, sum hesin meiriluti í fíggjarnevndini hevur lagt fram.

Hin triði minnilutin (Tordur J. Niclasen) førir fram:
Tvey tey seinru árini eru fleiri avtalur gjørdar millum Føroya Landsstýri og dansku stjórnina.

17. november í ár varð so aftur avtala gjørd millum partarnar. Hesaferð varð hon kallað "Fælleserklæring fra møde den 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre."

Í hesi avtalu verða allar áður gjørdar avtalur staðfestar.

Í sambandi við avtaluna frá 12. oktober 1993, var ein av treytunum frá danskari síðu, at "landsstyret inden udgangen af 1993 gennemfører yderligere budgetforbedringer på mindst 250 mió. kr. i forhold til dette fremsatte finanslovforslag for 1994. Budgetforbedringen omfatter både indtægts-og udgiftssiden."

Í avtaluni frá 17. november í ár verður hesum viðvíkjandi sagt: "at drifts-og anlægsunderskuddet for 1995 ikke overstiger 220 mill. kr. og således, at der opnås ligevægt på finansloven for 1998."

Tá landsstýrið í sambandi við samráðingarnar 17. november 1994 fór til Danmarkar, gjørdi Miðflokkurin í skrivi til løgmann vart við ymisk viðurskifti, har m.a. dentur varð lagdur á týdningin av - at skuldin til danir varð "niðurfryst" - til vit aftur verða før fyri at gjalda.

Her varð hugsað um **rentu- og avdráttarskáa!**

Ikki færri enn 484 mió. kr. í rentum tyngja útreiðslusíðuna á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995!

Henda útreiðsla er av sonnum "haft um beinini" og fordar í stóran mun fyri, at skaptar verða fortreytir hjá vinnuni at fóta sær, at arbeiðsskapandi virksemi verður stuðlað, skattalætti settur í verk og fólkaflytingin úr Føroyum steðgar.

Í avtaluni frá 17. november verður hetta frá danskari síðu ásannað, har sagt verður beinleiðis, at "Landskassens samlede gæld er vokset fra 1 mia. kr. i 1989 til 6 mia. kr. i 1994. Dette har medført, at renteudgifterne på den færøske finanslovforslag for 1995 lægger beslag på knap 20% af landskassens samlede udgifter..."

Tí var tað eitt satt vónbrot, at tað ikki eydnaðist føroysku samráðingarnevndini at fáa ein rentuskoða nøkur ár fram.

Hvat rentuni annars viðvíkur, er nýliga komið fram, at eftir øllum at døma gjalda føroyingar ov nógv í rentum fyri donsku rikislánini. Tøl millum 15 - 20 mió. kr. eru nevnd.

Tá danska stjórnin og Føroya landsstýri í fjør gjørdu avtaluna um, at danska stjórnin endurfíggjar uttanlandslán, varð sagt, at rentan skuldi verða eftir vanligum marknaðartreytum. Danskir búskaparfrøðingar hava nú sett spurnartekin við, um rentan er eftir vanligum marknaðartreytum ella ikki - og hava kannað hesi viðurskifti.

Niðurstøða teirra er, at føroyski landskassin (føroyski skattgjaldarin) rindar alt ov nógv í rentu fyri rikislánini.

Hetta krevur, at politiski myndugleikin, sum skjótast fær greiði á hesum viðurskiftum og verður tí sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinavegin at taka upp spurningin um rentuna fyri rikislánini við donsku stjórnina.

Úr landsstýrinum hevur verið sagt, at óneyðugt var at geva hesi avtaluni sjálvstøðuga viðgerð á løgtingi tí, at hon var so nær tengd at fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995 og kundi viðgerast saman við fíggjarlógaruppskotinum.

Hesum sjónarmiði var Miðflokkurin ikki samdur í og sum kunnugt varð "viðgerðini" av avtaluni frá 17. november ikki lív lagað í sambandi við 1. viðgerð av fíggjarlógini.

Inntøkusíða landskassans er tengd at mennandi virksemi og er ein uppgáva politikaranna, at skapa tryggan góðan karm um vinnulívið.

Í hesum sambandi hevur nógv verið tosað um "Vinnumenningargrunnin" samb. avtaluni frá 17. november.

Tá varð frá politiskari síðu sagt, at her var talan um ein beinleiðis stuðul frá donsku

stjórnini uppá 100 mió. kr.

Nú er so alment komið fram, at tað bert er talan um ein stuðul uppá 1 mió. kr., restin - 99 mió. kr. - er eitt lán, sum er rentu og avdráttarfrítt í 10 ár eftir, at grunnurin er stovnaður.

Tað er ørkymlandi hjá andstøðuni - og hjá føroyska fólkinum - rættiliga at skylja, hvussu frá politiskari síðu "eitt verður sagt í dag og eitt annað í morgin."

Var tað ein partur av avtaluni - soleiðis sum fráboðað varð - at nevndu 100 mió. kr. var ein beinleiðis stuðul. Ja, so átti at verið hildið fast við hesa støðu !!

Annars er hetta aftur eitt tekin um, hvussu umráðandi tað er, at landsstýrið kemur at greiða tinginum nágreiniliga frá nevndu avtalu - soleiðis, sum Miðflokkurin hevur skotið upp í løgtingsmáli 60/1994.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) vil enn einaferð undirstrika, at skulu fortreytir hjá vinnuni og einstaklingum gevast fyri menningini av hesum samfelag, so er tað sera átrokandi, at skattur og gjøld annars munandi lækka.

Verður tað ikki gjørt, so mennist vinnan ikki, arbeiðsloysið heldur fram og fólkaflytíngin úr Føroyum steðgar ikki !!!

Tí er at harmast um, at politisku fortreytirnar fyri hesum vórðu skotnar í senk. hin minniliga dagin, tá sambandsflokkurin og fólkaflokkurin sviku sínar veljarar og 18 undirskriftir um ein endurreisingarpolitikk ikki megnaðu at halda pørtunum saman.

Ein endurreisingarpolitikkur sum boðaði frá eini politiskari stevnu sum framvegis er neyðug, nevnliga

- at fáa javnvág í samfelagsbúskapin
- at útvega størri inntøku til tað føroyska samfelagið
- at gera tað liviligt hjá fólki í einum skipaðum, stabilum, sosialt og rættarliga tryggum samfelag
- at bøta rættartrygdina
- at røkja fiskastovnarnar á Føroyaleiðini við skyndsemi og við ábyrgd fyri framtíðini
- at fáa fiskivinnuna at hvíla í sær sjálvari
- at fáa betri marknaðaravtalu við ES
- at lækka kostnaðarstøðið
- at fáa lønsemið aftur í vinnuna
- at skapa nýggj arbeiðspláss
- at lækka skattatrýstið
- at bøta um trupulleikarnar hjá setbúsacigarum
- at verja umhvørvið á sjógvi og landi og
- at røkja og menna føroyskan mentannar og siðaarv.

Fyri at "styrkja" inntøkusíðuna verður í uppskoti landsstýrisins fráboðað,

-at lóg um fíggjarognaravgjald verður frá 1.1 1995 sett í verk
-at rentuskatturin hækkar úr 22% upp í 35%,
-at arvagjøldini hækka munandi

Eisini verður sagt "at tað er ætlan landsstýrissins at lætta um trýstið á inntøkuskattin...."

Verður so nærri hugt eftir hvør einamest kemur at fáa "skattalætta" so eru tað tey, ið forvinna mest!

Undir 1. viðgerð vísti Miðflokkurin á hetta órættvísið og átalaði, at størsti skattalættti kom at falla teim í lut, sum høvdu størstu inntøku! Meðan, tey mongu hvørs inntøka lá ímillum 140.000 - 200.000 fingu lítið og einki.

Víst varð samstundis á, at tað hevði verið sosialt meiri rættvíst, at skattalættin ætlaður til inntøku omanfyri kr. 400.000, heldur varð javnaður út sum lætti til "láginntøkur".

Miðflokkurin fer at koma við uppskoti hesum viðvíkjandi.

Í sambandi við "sparingar" á fíggjarlógini og at fáa javnvág í til fíggjarárið 1998 hevur landsstýrið samb. avtaluni frá 1994 bundið seg til m.a. sokallaðar "strukturrationaliseringar".

Hvørjar hesar í veruleikinaum verða, er okkum enn ókent. Tó eru ávísar ábendingar í fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins. Her serliga innan skúla-, mentannar- og heilsuverkið.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) er av tí áskoðan, at tað ikki er skilagott við fíggjarlógini sum amboð, at fremja sokallaðar "strukturrationaliseringar" **áðrenn** føstløgd ætlan og orðaskifti hava verið í tinginum um ávíkavist

- bygnaðin av skúlaverkinum
- bygnaðin av heilsuverkinum
- bygnaðin av almannaverkinum o.s.fr.

Tí kann sami minniluti ikki taka undir við t.d.

- at Fiskivinnuskúlin verður fluttur úr Vestmanna
(víst verður m.a. til skriv frá næmingum og skriv frá lærararáðnum á Fiskivinnuskúlanum í Vestmann)
- at HF-skeiðið verður flutt úr Klaksvík
(víst verður m.a. til skriv frá Klaksvíkar kommunu og skriv frá HF-næmingum)
- at partur av Miðnámsskúlanum verður fluttur úr Suðuroynni
(víst verður til skriv frá felagskommununum í Suðuroy)

Samsvarandi hesum verður tí sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at sleppa ætlanini um
- at flyta Fiskivinnuskúlan úr Vestmanna.
- at flyta HF-skeiðið úr Klaksvík
- at flyta part av Miðnámsútbúgvingini úr Suðuroy.

Í einum og hvørjum húsarhaldi er neyðugt við sparingum - so eisini hjá tí almenna.

Tó er tað sera umráðandi at gera sær greitt, hvussu spart verður og hvørjar avleiðingarnar verða av sparingunum.

"Plenuklipparametodan" kann lættliga hava óhepnar og óætlaðar avleiðingar.

Í uppskoti landsstýrisins verður her t.d. hugsað um sífkar sparingar, ið gjørdar eru á fleiri greinum.

Hvat § 12 viðvíkur, er minnijáttan uppá uml. kr. 3 mió., sum einamest rakar Klaksvíkar Sjúkrahús.

Játtanin til landssjúkrahúsið tykist at verða hækkað, men er í veruleikanum lækkað munandi, tá hugsað verður um, at fyri nærum somu upphædd, sum játtað er fyri 1994, verða nýggjar tænastur tiknar við í virksemi landssjúkrahúsins 1995.

Størri og størri byrðar verða lagdar á Heimarøktarskipanina uttan, at játtanin hækkar. Hetta er ser óheppið.

Umráðandi er nú, at vit fáa ein virknan skilagóðan heilsupolitik, har hvørt einstakt sjúkrahús kennir seg trygt í sínum virksemi í einum væl tilrættarløgdum heilsuverki, ið virkar sum ein eind.

Tann ótryggleika og tær rembingar, sum uppskot til løgtingsfíggjarlóg bera við sær, kann eingin liva við.

Tá m.a. hugsað verður um, at meir enn 400 mió. kr. árliga verða nýttar til okkara heilsuverk er tað eisini umráðandi, at brúkarin fær mest burturúr.

Vit eiga á løgtingi at fáa eitt aðalorðaskiftið um okkara heilsuverk og hvør kósin skal verða framyvir.

Tí verður skotið upp soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Við atliti til hvussu heilsuverkið skilabest skal skipast tekur landsstýrið neyðug stig til eitt "heilsupolitiskt" aðalorðaskifti á tingi.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) harmast um, at fortreytirnar fyri einum virksamum rúsdrekkapolitikki enn einaferð hava fingið eitt skot fyri bógvin. Uppskot landsstýrisins er kr. 9,5, tað sama sum í 1994 og 450.000 minni enn í 1993.

Hetta er at undrast yvir - serliga tá hugsað verður um, at tá nýggja rúsdrekkalógin varð samtykt, varð í samtykta álitinum boðað frá, at: "Tað almenna her og nú eigur at sýna viðgerðar- og eftirviðgerðarspurningunum nógv størri ans, enn gjørt hevur verið higartil. Hetta merkir so aftur, at tingið eigur at játta størri upphæddir til viðgerð og eftirviðgerð av rúsdrekkamisnýtarum."

Somuleiðis, varð áherðsla løgd á, at "meiri peningur eigur at verða játtaður til upplýsingar- og fyribyrgingarvirksemi..."

Havast skal í huga, at Rúsdrekkasøla Landsins er sett at hava eitt rakstraravlop uppá kr. 12,5 mió. og at landskassin fær einar 80 mió. kr. inn í punktgjøldum júst í sambandi við sølu av rúsdrekka.

Sær landsstýrið seg ikki ført fyri at seta neyðuga upphædd av til fyribyrgjandi/-viðgerðarlig tiltøk, ja, so er eitki annað til at taka, enn ávíst gjald av útsøluprísinum, sum fer beinleiðis í grunn - ætlað til fígging av viðgerðum/fyribyringandi tiltøkum.

Samsvarandi hesum verður tí skotið upp soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta í verk skipan, har ávís upphædd av útsøluprísinum av øli, vínl og brennivíni fer í grunn til fígging av arbeiðnum móti rúsdrekkamisnýtslu.

Hvat § 13 viðvíkur, er minnilutin av teirri áskoðan, at virksemið hjá Landsverkfrøðingsstovninum kring landið er av arbeiðsskapandi týdningi - ikki minst fyri tímlønta

lønmóttakaran. Tí verður eisini hildið skilaleyst at játtanin verður skorðin at beini.

Hvat strandferðsluni viðvíkur, eigur serliga at havast í huga viðurskifti teirra, sum búgva í Suðuroy, og at tær rutur, sum geva fitt av avlopi ikki verða skerdar og soleiðis koma at geva minni avlop enn hvat tær annars kundu. Her verður t.d. hugsað um ferðasambandið millum Leirvík og Klaksvík, og millum Vestmanna og Oyragjógv.

§ 14 hevur fingið "plenuklipparametoduna" at kenna.

T.d. er Tekniski skúlin í Havn skerdur soleiðis, at hesin ikki longur kann taka ímóti bil- og frisørlærlingum.
Í skrivi til løgtingið mótmæla umboð fyri Føroya handverksmeistarafelag og Føroya Handsverkarafelag m.a. at landsstýrið ikki ráførir seg við skúlan, Lærurráðið, sum ráðgevandi stovn hjá landsstýrinum ella vinnuna.

Hesir somu siga, at atgerðin móti Tekniska skúlanum er beinleiðis ein forðing fyri, at unga fólk okkara kann verða við í eini oljuvinnu, sum í royndi og veru er byrjað.

At kenna avleiðingarnar av "sparitiltøkunum" tykist ikki at hava verið fremst í huga, tá játtanin til Fróðskaparsetrið er skert. T.d. verður ein av avleiðingunum tann, at samstarv um verkætlanir, sum verða tíggjað uttanfitir detta niðurfyri og at lesandi ikki kunnu fullføra lesturin tey eru byrjað.

Umboð fyri stovnin hava í fíggjarnevndini sagt frá at játtanin ikki má fara niður um 10 mió. kr.

Sambært § 15 fær Sjónvarp Føroya 1 millión kr. í stuðli til raksturin.

Leingi hevur verið tosað um, at føroyskar sendingar verða tekstaðar, soleiðis at eisini deyvir hyggjarar kunnu fáa fulla nytta burtur úr teimum.

Her kundi so møguleiki verið fyri, at partur av hesi játtan - t.d. kr. 350.000 vórðu nýttar til nevnda endamál.

Samsvarandi hesum verður skotið upp soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Av rakstrarstuðlinum uppá 1 mió. kr. til Sjónvarp Føroya verða 350.000 kr. nýttar til at teksta føroyskar sendingar.

§ 17 er landsbúnaðarstudningurin skerdur við 2 mió. kr. og verður hetta av vinnuni

mett sera óheppi. Helst hevur landsstýrið ikki givið sær fær um avleiðingarnar.

Tá talan her er um eina vinnu, sum uttan iva kann mennast soleiðis, at vit gerast meiri sjálvbjargin á landbúnaðarøkinium so er tíðin ikki tann rætta at gera skerjingar.

Havast má somuleiðis í huga tær umstøður kappingarneytar okkara uttaneftir hava á hesum øki.

Á § 18 hevur landsstýrið boðað frá nøkrum tiltøkum sum kunnu hava týdning fyri øktum virksemi. Spell, at meirilutin í fíggjarnevndin nú ætlar at lækkað játtanirnar á hesum øki fyri at fáa pening til økt virksemi á ymiskum rakstrarkonti.

Landsstýrið hevði ætlanir um, at elprísurin til vinnuvirki skuldi lækkað úr 90 oyrum pr. kwh. niður í 75 oyru pr. kwh. og hevði í hesum sambandi sett kr. 7,5 mió. til "Kappingartillagandi tiltøk".

Meirilutin í fíggjarnevndin lækkar hetta talið við 2,5 mió. kr. soleiðis at virkini bert koma at fáa 10 oyra pr. kwh. í minniútreiðslsum.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) heldur at avgerð meirilutans ikki er gagnlig fyri vinnulívið.

Tá brúk verður fyri hvørjari krónu til menning av arbeiðsskapandi tiltøkum, heldur sami minnilutti tað heldur ikki verða skilagott at lækka annan stuðul á hesi § við heilum 2 mió. kr.

Í samband við § 19 ger Almannastovan í sínum viðmerkingum vart við, at útgjaldið til "Brenni- og samskiftisstudningurin" til hvønn einstakan pensionist í tíðarskeiðnum 1989 til 1993 er lækkað við 28,68%

Síðan MVG er sett á bæði olju-,sjónvarps- og útvarpsgjaldið, hava fleiri pensionistar gjørt Almannastovuna varuga við, at peningur ikki er tøkur til at gjald olju- sjónvarps og útvarpsgjaldið.-
Almannastovan er av teirri áskoðan, at Brenni- og samskiftisstudningurin er alt ov lágur, sammett við stuðulin 88/89 og eigur tí at hækkast.

Minnilutin kann taka undir við pørtum av teim broytingunum, ið skotnar verða upp av meirilutanum, men harmast um skerjingarnar - serliga á fløgusíðuni, sum kemur at skerja møguleikarnar fyri virksemi.

Vísaudi til viðmerkingarnar og í eini royndt at gera ábøtur á fíggjarlógaruppskotið setir minnilutin (Tordur J. Niclasen) fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 11.	11466 Fíggjarstýringarskipan v.m. verður		
	lækkað við	kr. 9.600.000	
	og sett til		kr. 0
	Greinin verður sett til		kr.144.958.000
§ 12	12109 Landssjúkrahúsið verður		
	hækkað við	kr. 2.000.000	
	og sett til		kr. 210.398.000
	12202 Klaksvíkar sjúkrahús verður		
	hækkað við	kr. 3.000.000	
	og sett til		kr. 37.964.000
	12907-303243 Uppl./viðg. av rúsdrekka-misnýtarum verður		
	hækkað við	kr. 800.000	
	og sett til		kr. 10.300.000
	Viðm. hækkanin verður at býta javnt millum Blákrossheimið og Heilbrigdið		
	Greinin verður sett til		kr. 357.315.000
§ 13	13265 Strandferðslan verður		
	hækkað við	kr. 1.000.000	
	og sett til		kr. 4.000.000
	Viðm. meirjáttanin at nýta til Suðuroyaleiðina.		
	13089 Postverkið verður		
	hækkað við	kr. 1.500.000	
	og sett til		kr. 1.500.000
	13094 Rakstur av veganeti verður		
	hækkað við	kr. 1.500.000	
	og sett til		kr. 23.500.000
	13018 Størri åbøtur verður		
	hækkað við	kr. 2.000.000	
	og sett til		kr. 4.200.000

	13018 Nýggir vegir og brýr verður hækkað við kr. 1.500.000 og sett til	kr. 15.000.000
	Greinin sett til	kr. 157.650.000
§ 14	14331 HF í Klaksvík verður hækkað við kr. 500.000 og sett til	kr. 2.050.000
	14364 Eysturoyar studentaskúli og HF skeið verður lækkað við kr. 298.000 og sett til	kr. 10.282.000
	14414 Tekniski skúli í Havn verður hækkað við kr. 1.500.000 og sett til	kr. 12.000.000
	14554 Fróðskaparsetur Føroya verðuðr hækkað við kr. 900.000 og sett til	kr. 10.000.000
	Greinin sett til	kr. 376.744.000
§ 15	15907-32037 Leikpallur Føroya verður lækkað við kr. 1.000.000 og sett til	kr. 700.000
	Greinin verður sett til	kr. 50.575.000
§ 17	17898-343013 Landbúnaðarstudningur verður hækkað við kr. 2.000.000 og sett til	kr. 15.500.000
	Greinin sett til	kr. 25.123.000
§ 18	Kappingatillagandi tiltøk verður hækkað við kr. 2.500.000 kr. og sett til	kr. 10.000.000
	18532 Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál verður hækkað við 1.000.000 kr. og sett til	kr. 4.000.000

	Greinin verður sett til	kr. 121.566.000
§ 19	19607 Heimarøktarskipanin verður hækkað við 1.000.000 kr. og sett til	kr. 61.070.000
	19678 Viðbót til ávísar pensjónistar verður hækkað við 3.000.000 kr. og sett til	kr. 9.500.000
	Greinin verður sett til	kr. 768.520.000
§ 22	25206/163018 Rentur verður lækkað við 15.000.000 kr. og sett til	kr. 457.000.000
	Greinin verður sett til	kr. 469.000.000

Eftir hesum broytingaruppskoti minnilutans verður hallið á løgtingsfíggjarlógini fyri 1995 kr. 198.000 kr. lægri enn á uppskoti landsstýrisins.

Loksins skal endurtakast, at rentubyrðan er ikki til at liva við og eigur tí landsstýrið serskilt at taka upp samráðingar við donsku stjórnina hesum viðurskiftum viðvíkjandi.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) setir tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Við atliti til at fáa rentuskoða, verður álagt landsstýrinum at taka upp nýggjar samráðingar við donsku stjórnina sum skjótast.

2. viðgerð 21. desember 1994. Uppskot landsstýrisins sum broytt av meirilutanum samtykt við 30-0 atkvøðum. Øll uppskot til samtyktar og broytingaruppskot frá minnilutunum fullu. Tó varð uppskot minnilutans (Anfinn Kallsberg) til samtyktar um flyting av skúlum samtykt við 19-0 atkvøðum.

22. desember 1994 løgdu løgtingsmenninir Anfinn Kallsberg og Tordur J. Niclasen fram soljóðandi

I Broytingaruppskot

til

3. viðgerð

Grein 10.
Rakstrarstað 10158: Løgtingsskrivstovan
"Tænastuveitingar til løgtingsnevndir"

Játtanin verður hækkað við 750.000 kr. og rakstrarstaðið "Løgtingsskrivstovan" sett til — kr. 3.593.000

Í sambandi við nýggju stýrisskipannarlógina, verður nógv størri arbeiðsbyrða løgd á løgtingsskrivstovuna í sambandi við lógararbeiði. Tí verður neyðugt at styrkja løgfrøðisliga partin á løgtingsskrivstovuni.

Grein 10 verður sett til — kr. 19.853.000

Grein 14.
Rakstrarstað 14331: HF í Klaksvík
Játtanin verður hækkað við 450.000 kr. og sett til — kr. 2.000.000

Rakstrarstað 14205: Suðuroyardepilin
Játtanin verður hækkað við 120.000 kr. og sett til — kr. 4.620.000

Rakstrarstað 14364: Eysturoyar Studentask. og HF

Játtanin verður lækkað við 300.000 kr. og sett til — kr. 10.280.000

Av tí, at løgtingið við 2. viðgerð samtykti, at eingin skúli verður fluttur grundað á viðmerkingarnar til fíggjarløgtingslógaruppskotið fyri 1995, er neyðugt at játta somu upphædd til omanfyri standandi skúlar. Játtanin verður

hækkað/lækkað til somu upphædd, sum galdandi er fyri 1994.

Grein 14 verður sett til kr. 382.712.000

Uppskotini fullu við ávikavist 9-0 og 4-0 atkvøðum.

22. desember 1994 legði Tordu J. Niclasen, løgtingsmaður fram soljóðandi

II Broytingaruppskot

til

3. viðgerð

Grein 19.
Rakstrarstað 19042: Serforsorgin verður hækkað við 1,5 mió. kr. og sett til kr. 45.000.000

Grein 19 verður sett til kr. 764.520.000

Vísst verður til hjálagda notat frá Almannastovuni.

Uppskotið fall við 3-0 atkvøðum.

22. desember 1994 legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariasen og Finnbogi Ísakson) setir fram soljóðandi broytingaruppskot:

Grein 15 Mentan:
15983 Føroya Náttúrugripasavn viðlíkahald verður hækkað við kr. 500.000,- og sett til kr. 2.150.000

Greinin verður sett til kr. 52.075.000

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi broytingaruppskot

Grein 17 Landbúnaður
17898 343013 Landbúnaðarstudningur verður hækkað
við kr. 1 mió. og sett til kr. 14.500.000

Greinin verður sett til kr. 24.123.000

Grein 19 Almannamál v.m.
19904 363 628 Alv verður hækkað
við kr. 40.000,- og sett til kr. 340.000

Greinin verður sett til kr. 759.210.000

3. viðgerð 22. desember 1994. Broytingaruppskotini samtykt við 24-0 og 31-0 atkvøðum. Lógin soleiðis broytt samtykt við 29-0 atkvøðum.

Lóg nr. 127 frá 22. desember 1994.

31 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, fríggjadagin 2. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broyting-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

ar:

1) Í § 33 verður nr. 1) orðað soleiðis:
"Rentuútreiðslur av íløgu- og rakstrarskuld í sambandi við vinnuvirki og útreiðslur til provisión, stovningarprovisión ella premiu í samband við lántøku ella ábyrgd til vinnuvirki. Frádrátturin fyri rentuútreiðslur er tó treytaður av, at renturnar eru komnar til gjaldingar aftaná 31.12.1994, og eru goldnar viðkomandi skattaár. Rentuútreiðslurnar metast at verða goldnar, um so er, at tær, av einum peningastovni, eru afturatskrivaðar kassakredittinum ella líknandi leypandi viðurskiftum, uttan at kredittturin hervið fer upp um tað avtalaða hámarkið."

2) Í § 33. nr. 2) verður sum nýtt 2. pkt. innsett:
"Í letta er tó bert galdandi fyri lán og ábyrgd, avtalaði áðrenn 3. desember 1994".

3) Í § 33, nr. 2) verður "sbr. nr. 6" broytt til: "sbr. nr. 5".

4) Í § 33, nr. 9) verður sum nýtt 3. pkt. innsett:
"Undantikin eru tó tap, ið skattgjaldari, sum veitir lán til eitt virki við vinnuligum endamáli, hevur".

5) 3. pkt. verður hereftir 4. pkt.

6) Í § 33, nr. 11) verður orðað soleiðis:
"Í mesta lagi 20.000 kr. árliga av lønarútreiðslum og av helvtini av tilfarskostnaðinum í samband við umvæling, umbygging og liðuggerð av egnum bústaði, treytað av at arbeiðið er gjørt av virki, ið er meirvirðisgjaldsskrásett sambært reglunum í løgtingslóg um meirvirðisgjald. Frádrátturin kann í mesta lagi vera 20.000 kr. árliga pr. bústað. Um bústaðurin er ogn hjá meir enn einum skattgjaldara, verður frádrátturin at býta í sama lutfalli, sum eigaraviðurskiftini eru. Lands-

1) I § 33 affattes nr. 1) således:
"Renteudgifter af investerings- og driftsgæld i forbindelse med erhvervsvirksomheder og udgifter til provision, stiftelsesprovision eller præmie i forbindelse med optagelse af lån eller afgivelse af kaution til erhvervsvirksomheder. Fradrag for renteudgifter er dog betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31.12.1994 og er betalt i vedkommende skatteår. Renteudgifterne anses for betalt, når de af et pengeinstitut tilskrives den skattepligtiges kassekredit eller lignende løbende mellemværende, uden at kreditten herved overstiger det aftalte maksimum.".

2) I § 33, nr. 2) indsættes som nyt pkt. 2:
"Dette gælder dog kun for lån og kaution, som er aftalt før 3. december 1994".

3) I § 33, nr. 2) ændres "jfr. nr. 6": til "jfr. nr. 5".

4) I § 33, nr. 9) indsættes som nyt pkt. 3.
"Tab, som en skatteyder der yder lån til en erhvervsvirksomhed har, er dog ikke omfattet af denne bestemmelse".

5) pkt. 3 bliver herefter til pkt. 4.

6) I § 33 affattes nr. 11) således:
"Højst 20.000 kr. årligt af lønudgifter og af halvdelen af materialeudgifter i forbindelse med vedligeholdelse, ombygning og færdiggørelse af egen bolig, betinget af at arbejdet er udført af en virksomhed, der er merværdisregistreret i henhold til reglerne i lagtingslov om merværdiafgift. Fradraget kan højst udgøre 20.000 kr. årligt pr. bolig. Såfremt boligen ejes af mere end en skatteyder, bliver fradraget at fordele i samme forhold, som ejendomsfor-

stýrinum verður heimilað við kunngerð at áseta nærri reglur fyri, hvat er at skilja við umvæling, umbygging og liðuggerð og fyri umsiting av hesum reglum."

7) Í § 33 nr. 12) verður 1. pkt. orðað soleiðis: " Meirútreiðslur til kost, húsaleigu, ferða- og flutningsútreiðslur, sjúkra- og vanlukkutryggingar, ið skattgjaldari hevur vegna inntøkugevandi arbeiði í útlondum ella umborð á útlendskum skipi, sambært hesi áseting, treytað av, at dvølurin uttanlands er vegna arbeiði, og at dvølurin uttanlands innan fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið antin er 2 mánaðir uttan slit, ella í minsta lagi 100 samdøgur innan fyri eitt 12 mánaðar tíðarskeið.

8) Í § 33 verður sum nýtt nr. 13) sett:
"hjá persóni undir fullari skattskyldu, sum hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útróðrarpart, ein upphædd í samband við ferðing millum bústað og arbeiðsstað eftir reglunum í litra a - e:

a) Frádrátturin verður veittur við eini upphædd, sum verður roknað, grundað á vanligu ferðaleiðina millum bústað og arbeiðspláss, eftir einum kilometurtaksti, sum verður ásettur av Líkningarráð Føroya.
b) Frádráttur kann tó bert veitast fyri tann partin av ferðaleiðini, sum aftur og fram pr. arbeiðsdag er hægri enn 15 kilometrar.
c) Fyri ferðing sjóvegis millum bústað og arbeiðsstað verður frádrátturin loyvdur svarandi til ferðakostnaðin á hægsta avsláttarstigi fyri persón uttan flutningstól.
d) Landsstýrið kann áseta neyvari reglur um fyrisitingina av hesum

holdene er. Landsstyret bemyndiges til i bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler for, hvad der skal forstås ved vedligeholdelse, ombygning og færdiggørelse og for administrationen af disse regler."

7) I § 33 nr. 12) affattes pkt. 1. således:
"Merudgifter til kost, logi, rejse og befordringsudgifter, syge- og ulykkesforsikringer, der påføres skatteyder i forbindelse med indtægtsgivende arbejde i udlandet eller ombord på udenlandsk skib efter disse regler, forudsat at den pågældende inden for et tidsrum af 12 måneder har haft uafbrudt ophold i udlandet i 2 måneder eller, at opholdet i udlandet i løbet af et sammenhængende tidsrum af 12 måneder i alt har omfattet mindst 100 døgn.

8) I § 33 indsættes som nyt nr. 13):
"hos person, der er fuldt skattepligtig, og som har lønindtægt, herunder indtægter ved partsfiskeri, et beløb i forbindelse med befordring mellem bopæl og arbejdsplads efter reglerne i litra a - e:

a) Fradraget ydes for befordring frem og tilbage mellem bopæl og arbejdsplads og foretages med et beløb, som beregnes på grundlag af den normale transportvej efter en kilometertakst, der fastsættes af Ligningsrådet.
b) Fradrag kan dog kun foretages for den del af befordringen, som frem og tilbage pr. arbejdsdag overstiger 15 kilometer.
c) For befordring ad søvejen mellem bopæl og arbejdsplads tillades et fradrag, der svarer til billetprisen med størst rabat for person uden befordringsmiddel.
d) Landsstyret kan fastsætte nær-

reglum. herundir reglur um, hvussu vanliga ferðaleiðin verður fastløgd.

e) Verður móttikið fult ella partvíst skattafrítt ferðaendurgjald eftir § 29, nr. 7, kann frádráttur ikki veitast eftir reglunum í hesi grein fyri ta ferðing, ið skattafría ferðaendurgjaldið verður latið fyri.

9) Í § 46, stk. 2 verða hesar broytingar gjørdar:
"nettorentuupphæddini uppgjørd sambært stk. 3 - 5 í hesi §" verður broytt til: "rentuupphæddini" og "nettorentuupphædd" verður broytt til: "rentuupphædd".

10) Í § 46 verður í stk. 2 sum nýtt 2. pkt. sett:
"Frádráttur fyri rentu er tó treytaður av, at renturnar eru komnar til gjaldingar aftaná 31.12.1994 og eru goldnar viðkomandi skattaár."

11) 2. pkt. verður hereftir 3. pkt.

12) Í § 46 verða stk. 3, 4 og 6 strikað.

13) Stk. 5 verður hereftir stk. 3, og stk. 7 verður stk. 4.

14) Í § 46 stk. 5 verður pkt. 1 orðað soleiðis:
"Skattskyldug hjún, sum búgva saman gera sjálvi av, hvussu samlaða rentuupphæddin sambært stk. 2 skal verða býtt teirra millum."

15) Í § 46 a verður stk. 1 orðað soleiðis:
"Við gildi frá 18. januar 1991 er hinum skattskylduga loyvt at draga frá í útroknaða kommunuskattinum í mesta lagi 13 % av 60.000 kr. - skattskyldug hjún, sum búgva saman tó í mesta lagi 13 % av samanløgdum 120.000 kr. - av rentum av privatari skuld og útreiðslum til provisjón, stovningarprovisjón ella premiu í sambandi við privata lántøku, sum avtalað er 18. januar 1991 ella seinni, til keyp ella bygging av

mere regler om administrationen af disse regler, herunder regler om, hvordan den normale transportvej fastlægges.

e) Modtages hel eller delvis skattefri befordringsgodtgørelse efter § 29, nr. 7, kan der ikke foretages fradrag efter reglerne i denne paragraf, for den befordringen, som skattefri befordringsgodtgørelse modtages for.

9) I § 46 stk. 2 foretages disse ændringer:
"nettorentebeløbet, opgjort i henhold til stk. 3-5 i denne §" ændres til: "rentebeløbet", og "nettorentebeløb" ændres til "rentebeløb".

10) I § 46 indsættes i stk. 2 som nyt pkt. 2:
"Fradrag for renteudgifter er dog betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31.21.1994 og er betalt i vedkommende skatteår."

11) Pkt. 2 bliver herefter til pkt. 3.

12) I § 46 slettes stk. 3, 4 og 6.

13) Stk. 5 bliver herefter stk. 3 og stk. 7 bliver stk. 4.

14) I § 46, stk. 5 affattes pkt. 1 således:
"Samlevende ægtefæller, der er skattepligtige, afgør selv, hvorledes det jfr. stk. 2 opgjorte samlede rentebeløb skal fordeles mellem dem."

15) I § 46 a affattes stk. 1 således:
"Med virkning fra 18. januar 1991 kan den skattepligtige fradrage renter af privat gæld og udgifter til provision, stiftelsesprovision eller præmie i forbindelse med privat låntagning, som er aftalt 18. januar 1991 eller senere, til køb eller opførelse af egen bolig, til istandsætning og ombygning af egen bolig, til uddannelseslån og til betaling af afgiven kaution i henhold til § 33, nr. 2) i denne lagtingslov, såfremt

egnum bústaði, til umvæling og umbygging av egnum bústaði, til útbúgving og til gjalding av ábyrgd sambært § 33, nr. 2) í hesi løgtingslóg, um so er, at ábyrgdin er avtalað áðrenn 3.12.1994. Frádráttur fyri rentuútreiðslur er, treytaður av at renturnar eru komnar til gjaldingar aftaná 31.12.1994 og eru goldnar viðkomandi skattaár."

16) § 46 b verður strikað.

17) Sum nýggj § 154 a verður sett:

"**§ 154 a.** Persónar, ið eru undir fullari skattskyldu, sambært § 1 í hesi lóg, og sum hevur fingið løn fyri tænastu umborð á donskum fiskiførum, kunnu í tí álíknaða skattinum draga eina upphædd frá, svarandi til tað í Danmark goldna arbeiðsmarknaðgjaldið av tí nevndu inntøkuni. Frádráttur í pkt. 1 verður veittur tá skattgjaldarin við skjalprógvar, at hann hevur goldið arbeiðsmarknaðargjaldið. Lækkingin í inntøkuskattinum verður lutfalsliga býtt millum kommunu- og landsskattin."

§ 2

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1995, tó koma fylgjandi broytingar í gildi soleiðis:

2) fær gildi fyri lán og ábyrgd, sum eru avtalað 3. desember 1994 ella seinni.

6) er bert galdandi fyri 1995. Tó kann loyvast ein frádráttur uppá í mesta lagi 20.000 kr. fyri 1996, treytað av at umbyggingin/umvælingin/liðuggerðin er byrjað 1995.

15) fær gildi fyri lán ið eru tikin til gjaldingar av ábyrgd sum er avtalað 3. desember 1994 ella seinni.

kautionen er aftalt før 3.12.1994, i den udregnede kommuneskat med højst 13 % af 60.000 kr. - samlevende ægtefæller dog med højst 13 % af sammenlagt 120.000 kr.

Fradrag for renteudgifter er dog betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31.12.1994 og er betalt i vedkommende skatteår.

16) § 46 b slettes.

17) Som ny § 154 a indsættes:

"**§ 154 a.** Personer, der er fuldt skattepligtige, jfr. § 1 i denne lov, og som har erhvervet lønindkomst ved tjeneste ombord på danske fiskefartøjer, kan i den påligende skat fradrage et beløb, som svarer til det i Danmark betalte arbejdsmarkedsbidrag af nævnte indkomst. Fradraget i pkt. 1 er betinget af, at skatteyderen dokumenterer, at han har betalt arbejdsmarkedsbidraget. Nedsættelsen i indkomstskatten deles forholdsmæssigt mellem kommune- og landsskatten."

§ 2

Denne lov træder i kraft 1. januar 1995, dog træder følgende ændringer i kraft således:

2) træder i kraft for lån og kautioner, som er aftalte den 3. desember 1994 eller senere.

6) har kun gyldighed for 1995. Dog kan tillades et fradrag på max. 20.000 kr., betinget af at vedligeholdelsen/ ombygningen/færdiggørelse er påbegyndt i 1995.

15) træder i kraft for lån optaget til betaling af kaution aftalt den 3. desember 1994 eller senere.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broyting í skattalógini saman við uppskoti til broyting í ásetingarlógini fevna um broytingar, ið eru avtalaðar í samgonguskjalinum, men eisini verða gjørdar nakrar broytingar, ið landsstýrið metir neyðugar orsakað av, at lógin á viðkomandi økjum ikki er tíðarhóskandi ella virkar óheppin.

Nakrar av teimum broytingum, ið avtalaðar eru í samgonguskjalinum, eru ikki við í hesum uppskoti, men arbeiðir landsstýrið við at fáa tær framdar.

Skotið verður upp:
at lækka marginalskattin á tann hátt, at meginparturin av tí eykaskatti, ið var álagdur í 1992 og 1993, verður tikin av aftur.

at hækka persónsfrádráttin hjá pensionistum. Í samgonguskjalinum var avtalað at grundupphæddin hjá pensionistum skuldi gerast skattafrí. 2/3 av hesum tiltaki verður framt í 1995.

at hækka felagsskattin úr 22 % upp í 27 % fyri at hesin kann góðtakast av grannalondum okkara og fyri at minka um mismunin millum persónsskatt og felagsskatt.

at nokta frádrátt fyri kautiónum og lánum ið privatpersónar hava veitt vinnuvirkjum. Henda regla hevur virkað búðskaparliga avlagandi og skapt fíggjarlógartrupuleikar.

at broyta reglurnar fyri frádrátti av rentuútreiðslum soleiðis at hesar framyvir kunnu dragast frá tað ár tær verða goldnar, og ikki sum nú tað ár tær verða tilskrivaðar.

at leingja møguleikan í eitt ár at draga sethúsaútreiðslur frá. Eisini verða ábøtur gjørdar á hesar reglur.

at seta ferðafrádrátt í gildi aftur, tó við lægri upphæddum.

at veita føroyskum skattgjaldarum frádrátt fyri bruttoskatt teir eru tvungnir at gjalda í Danmark.

at taka av mótrokningina millum rentuútreiðslur og rentuinntøkur
tá málið við hesum reglum er nátt.

Rentur av vinnuligum lánum 1).
Í hesi grein verður gjørd broyting, soleiðis at - eins og fyri rentur av privatari skuld, sí viðm. til pkt. 10) og 15) í skattalógaruppskotinum - skal rentan av vinnuligum lánum eisini vera gjaldkomin og goldin, áðrenn hon kann dragast frá.

Skotið verður tí upp, at rentuútreiðslur av vinnuligum lánum kunnu dragast frá skattskyldugu inntøkuni treutað av, at hon er komin til gjaldingar 31.12.1994 og er goldin viðkomandi skattaár.

Tað at rentan er goldin skal tulkast soleiðis, at um tað snýr seg um ein kassakreditt ella líknandi leypandi viðurskifti, so verður rentan roknað sum goldin, um saldo á kontoini við roknskaparárs enda ikki er størri enn avtalaða hámarkið. Er saldoin størri enn avtalaða hámarkið, verður rentufrádrátturin skerdur við "yvirtrekkinum", tó soleiðis at rentufrádrátturin framhaldandi verður loyvdur fyri upphæddina, ið er í samsvar við avtalaða hámarkið.

Tá tað snýr seg um onnur vinnulig viðurskifti, so sum vinnulig lán, eitt nú til bygningar ella maskinur, so verður rentan roknað sum goldin, um hon er gjaldkomin og goldin við endan av avvarðandi roknskaparskeiði.

Mótrokningin millum rentuútreiðslur og rentuinntøkur 1) 9) 12) 14) 16).
Fyriliggjandi uppskot ásetur, at reglurnar fyri mótrokning millum rentuútreiðslur og rentuinntøkur, áðrenn rentuútreiðslurnar kunnu dragast frá í skattinum skulu avtakast. Eftir uppskotnu broytingunum vil tað framyvir ikki hava týdning fyri frádráttarrætt fyri rentuútreiðslurnar, hvussu stóra rentuinntøku viðkomandi skattgjaldari hevur av innistandandi.

Grundgevingin fyri at taka hesar reglur av er, at málið fyri hesar reglur er mátt. Málið var at steðga tí rentuspekulatión sum tók seg um, í árinum upp til 1991.
Ein rentuskattur uppá 22 % og eitt fíggjarognaravgjald uppá 1,9 %, hevur verið við til at gjørt slíkar rentuspekulatiónir óaktuellar.

Kautión, lán til vinnuvirkið, privatar rentuútreiðslur.
Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt viðvíkur strikan av reglunum um frádrátt fyri kautiónstap v.m. og ein "uppstramning" av reglunum um frádrátt fyri privatar rentuútreiðslur.

Kautiónstap og lán til vinnuvirki 2) 4).
Fyriliggjandi uppskot ásetur, at reglurnar fyri kautiónsfrádrátt og tap, sum skattgjaldari, ið veitir lán til vinnuvirki, hevur, bert skulu verða galdandi fyri kautiónir og lán, sum eru avtalaði áðrenn framløgudagin. Eftir uppskotnu broytingunum vil tað ikki verða møguligt framyvir, at fáa frádrátt fyri kautiónstap mv., um so er at kautiónin ella láni er avtalað framløgudagin ella seinni.

Grundgevingin fyri at taka hesar reglur av er, at tað í flestu førum gongur long tíð, í nógvum førum mong ár frá tí at kautión ella lán er givið, til frádráttur gerst veruleiki. Ein avtøka av reglunum merkir sostatt, at fíggjarstýringin verður lættari.

Í 1993 høvdu 216 persónar tap av lánum og ábyrgdum til vinnuvirki, sum var drigið frá í inntøkuni. Tað samlaða tapið fyri hesar persónar var í 1993 uppá 43.584.259 kr.

Privatar rentuútreiðslur 10) 15).
Fyriliggjandi uppskot ásetur, at rentuútreiðslur skulu verða komnar til gjaldingar og verða goldnar, fyri at skattgjaldari kann fáa frádrátt fyri hesar. Eftir uppskotnu

broytingunum vil hetta bera við sær, at f.eks. skattgjaldari, sum hevur húsalán, men ikki er førur fyri at gjalda rentur og avdrøg, ikki kann draga rentuútreiðslurnar frá, fyrr enn hann hevur goldið hesar.
Uppskotna broytingin skuldi verið við til, at byrgt fyri, at f. eks. ein húsacigari kemur í óføri, um hann frádregur rentuútreiðslur, hann ikki hevur goldið, og av hesum fær ein cykaskatt tá skattaárið er farið.

Fyriliggjandi uppskot ásetur eisini, at frádráttur fyri rentuútreiðslur sum standast av lánum, sum verða tikin at gjalda effektiva kautión - sum er avtalað á framløgudegnum ella seinni við, - ikki er gjørligur longur.

Orsøkin til, at hendan reglan verður avtikin er, at frádráttur fyri rentuútreiðslur sum standast av omanfyri nevndu lánum, er eitt undantak til høvuðsregluna um, at frádráttur fyri rentuútreiðslur av privatum lánum ikki er loyvdur. Tá frádráttur fyri tap av lánum og ábyrgdum til vinnuvirkum verður avmarkað, sýnist tað ikki at verða grund fyri, at skattgjaldari kann táa frádrátt fyri rentuútreiðslur, sum standast av, at lán verður tikið at gjalda tað umrøddu kautiónina við.

Umvæling/umbygging 6).
Í mai 1993 samtykti løgtingið at loyva setbúsacigarum at draga 10.000 kr. frá á sjálvuppgávuni fyri lønarútreiðslur til umvæling v.m. av setbúsum. Endamálið við lógini var at geva setbúscigarum betri møguleikar at halda sínar ognir viðlíka, og at skapa meira arbeiði innan timbur- og handverksvinnuna.
Skjótt var greitt at upphæddin uppá 10.000 kr. var ov lítil, og at betur var um ein partur av tilfarskostnaðinum eisini kundi dragast frá. Tí mælti landsstýrið longu í august sama ár, at hækka upphæddina við 20.000 kr. og loyva frádrátt fyri helvtina av tilfarinum.

Timbur- og handverksvinnan og skattgjaldarin hava tikið gott undir við omanfyri nevndu lógaráseting. Tí at hetta hevur ført við sær, at nógv fleiri umvælingar/umbyggingar eru blivnar gjørdar, enn um eingin skattafrádráttur hevði verið. Fyri landsskassan førir hetta við sær, at innløkur koma inn, tað veri seg meirvirðisgjald og skattur av lønini hjá handverkaranum, og henda ásetingin minkar eisini um svart arbeiði, tá ið fyritreytin fyri at fáa frádrátt er at arbeiði verður gjørt av einum meirvirðisgjaldsskrásettum virki. Nakrar broytingar eru í fyriliggjandi uppskoti landsstýrisins, í mun til ásetingina ið var galdandi fyri 1993 og 1994.

Umframt umvæling og umbygging er uppskot landsstýrinsins at liðuggerð eisini verður umfatað av § 33 nr. 11). Lógin og kunngerðin ið var galdandi fyri 1993 og 1994 hevði ávísar óhepnar fylgir, sum t.d. at fólk keyptu sær eina frystiboks og fingu ein elektrikara at skifta eina el-kontakt út, sum so førdi við sær at "ein ávís arbeiðstænasta var gjørd" og sostatt heimilaði skattafrádrátt fyri helvtini av tilfarskostnaðinum, tvs.í hesum føri frystiboksini. Hetta verður so regulerað í kunngerð, so at arbeiðslønin altíð er ájavnt tilfarskostnaðinum.

12 mánaðar tíðarskeið 7).
Broytingin í § 33, nr. 12 er ein lógarteknisk broyting, og er grundað á, at orðingin frá fyrstani tíð hevur verið óhóskandi.

Eftir núgaldandi lóg, vil skattgjaldari, sum t.d. fer uttanlands í november mánað vegna arbeiði - antin á landi ella umborð á útlendskum skipi - ikki lúka treytirnar fyri at fáa frádrátt fyri meirútreiðslur til kost, ferðaútreiðslur vm., hvørki eftir reglunum um at verða burtur í 2 mánaðir uttan slit ella í minsta lagi 100 samdøgur í **inntøkuárinum**. Harumframt kann "restriktiónin", inntøkuárið hava tað avleiðing, at skattgjaldari, sum dvølur uttanlands vegna arbeiði í seinasta parti av inntøkuárinum, men av einari ella aðrari orsøk t.d. av sjúku er noyddur at koma heim, áðrenn hann hevur verið burturi í 2 mánaðir, kann koma sera illa fyri fíggjarliga, um so er at viðkomandi hevur verið fyribilsskrásettur við frádrátti fyri meirútreiðslur til kost vm.

Í uppskotinum til nýggju orðingina av § 33, nr. 12, 1. pkt. vil tað ikki hava týdning, nær í inntøkuárinum ein skattgjaldari fer uttanlands vegna arbeiði.

Ferðafrádráttur bústað/arbeiði 8).

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins, mælir til at ferðafrádráttur verður objektivt mettir eftir hvussu langa vegalongd viðkomandi hevur frá bústaði til arbeiðsstað eftir vanligari ferðaleið, og í hesum sambandi verða ásetingarnar í Álmanakkanum brúktar.

Í uppskoti landsstýrisins, kann frádráttur bert veitast fyri tann partin av ferðaleiðini, sum aftur og fram pr. arbeiðsdag er hægri enn 15 kilometrar.

Harumframt skal komast fram til eina upplædd ið er "meðaltal" av ferðing við almenna ferðasambandinum grundað á vanligu ferðaleiðina við hægsta avsláttarstiga fyri persón uttan flutningstól.

Toll- og Skattstovan metir at hetta verður ein frádráttur á:

Ferðafrádráttur:
Tá kostnaðurin við almenna ferðasambandinum er bíligari fyri tey longu strekkini enn fyri tey stuttu, verður mælt til at gera eina skipan við ymiskum frádráttum, alt eftir fjarstøðu, tó soleiðis, at frádráttirnir eru eins fyri alt landið.

Roknað út frá kostnaðinum av mánaðarkorti, sum er bíligasti ferðaháttur við almenna ferðasambandinum verður skotið upp at nýta hesar satsir.
- Er fjarstøðan millum heim og arbeiðsstað 15 km ella minni, verður eingin frádráttur latin.
- Er fjarstøðan millum 15 og 48 km, verður latin frádráttur við 0,74 kr. fyri hvønn km, sum fer uppum 15 km.
- Er fjarstøðan størri enn 48 km, verður umframt latin frádráttur, ið er 0,18 kr. fyri

hvønn km omanfyri 48.

Frádrátturin verður latin fyri ferðing eina ferð aftur og fram dagliga, og verður at galda fyri hvørt tænastuviðurskifti sær, um løntakarin hevur fleiri enn eitt starv.

Skotið verður upp, at útrokningin verður gjørd grundað á, at eingin frádráttur er galdandi fyri teir fyrstu 15 km hvønn dag.

Dømi 1: Farleiðin er 74 km hvønn veg hvønn dag í 220 arbeiðsdagar:

- 15 km á 0 kr.	kr. 0,00
48 km - 15 km = 33 km á 0,74 kr.	kr. 24,42
(74 km x 2) = 148 km á 0,18 kr.	kr. 18,00
Ferðafrádráttur hvønn dag	kr. 42,42

Um arbeitt verður í 220 dagar, verður frádrátturin 220 x 42,42 kr. ella 9.332,40 kr. um árið. Viðmerkjast skal, at mánaðarkort til almenna ferðasambandið kostar 9.000 kr. árliga á slíkum strekkjum.

Dømi 2: Løntakarin er í tveimum størvum. Fjarleiðin millum heim og arbeiðsstað fyri tað eina er 7 km í 220 dagar og í hinum 40 km í 120 dagar.

- **Starv 1.** Her verður eingin frádráttur fyri ferðing, tá fjarstøðan er stytri enn 15 km aftur og fram hvønn dag.
- **Starv 2.**

15 km á 0 kr.	kr. 0,00
48 km - 15 km = 33 km á 0,74 kr.	kr. 24,42
(40 km x 2) = 80 km - 48 km á 0,18 kr.	kr. 5,76
Ferðafrádráttur hvønn dag	kr. 30,18

Um arbeitt verður í 120 dagar, verður frádrátturin 120 x 30,18 kr. ella 3.621,60 kr. 120 arbeiðsdagar svara til millum 5 og 6 mánaðir við 22 arbeiðsdøgum í hvørjum. Prísurin á mánaðarkorti á slíkum strekki er 600 kr. Frádrátturin svarar sostatt til kostnaðin av 6 mánaðarkortum.

Tá lógaruppskotið eisini loyvir frádrátt fyri ferðing sjóvegis fyri **persónin uttan flutningstól svarandi til ferðakostnaðin á lægsta avsláttarstigi**, verður skotið upp at veita ein frádrátt, sum svarar til ein túr aftur og fram um dagin. Mánaðarkort til Strandfaraskip Landsins, burtursæð frá suðuroyarsiglingini kostar 450 kr. svarandi til, at hvør túrur, um siglt verður tvær ferðir um dagin í 22 arbeiðsdagar pr. mánað, kostar uml. 20 kr. Viðvíkjandi suðuroyarsiglingini er upplýst, at mánaðarkort bert verða nýtt av einum ella tveimum persónum, annars verða 10-túra kort nýtt. Suðuroyingar, sum helst ikki ferðast norðureftir hvønn dag í viku, um teir hava arbeiði norðanfjørðs, hava sostatt eina útreiðslu av siglingini, sum er 2 x 59,50 kr. ella 119 kr. um vikuna (norður mánamorgun og suður vikuskiftið), har útreiðslan hjá teimum, sum ferðast við hinum skipunum hjá Strandferðsluni við mánaðarkorti er fjórðingurin av 450 kr. ella uml. 110 kr. (5 dagar).

Um teir, sum ferðast suðuroyarleiðina, fáa 20 kr. sum frádrátt fyri hvønn arbeiðsdag norðanfjørðs, uttan mun til, um teir bert ferðast 2 ferðir um vikuna, so fáa teir ein frádrátt, sum er á leið tað sama, sum teir fáa, sum á øðrum leiðum ferðast hvønn arbeiðsdag í vikuni.

Skotið verður tí upp, at frádrátturin fyri ferðing sjóvegis verður 10 kr. x 2 fyri hvønn **arbeiðsdag**, galdandi fyri allar ferðaleiðir hjá Strandfaraskipum landsins.

Arbeiðsmarknaðargjaldið ið goldið verður í Danmark 17).

Hetta uppskot til broytingar heimilar ein frádrátt fyri ávísar persónar, ið gjalda "arbejdsmarkedsbidrag" til danska statin av lønarinntøku v.m. í Danmark.

Fyriliggjandi uppskot ásetur, at fiskimenn, sum eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, og ið sigla við donskum skipum, skulu fáa frádrátt í Føroyum, fyri ta upphædd ið er goldin í arbejdsmarkedsbidrag/bruttoskatti í Danmark av lønarinntøku teirra.

Orsøkin til at hetta nú stingur seg upp er, at arbejdsmarkedsbidraget/bruttoskatturin ikki er at meta sum skattur, men eitt avgjald, og tískil ikki er umfatað av tvískattasáttmálanum millum Danmark og Føroya.

Avgjaldsgrundarlagið fyri omanfyri nevndu fiskimenn er:

-lønarinntøkan, ið vunnin er við donskum fiskiførum
-ATP av hesi inntøku
-Pensiónsgjald til arbeiðsgevaraadministreraðar pensiónsskipanir

Avgjaldið, ið skattgjaldarin skal gjalda, er ein prosentpartur av avgjaldsgrundarlagnum. Avgjaldið er:
1995: 6,0%
1996: 7,0%
1997: 8,0%
1998: 8,0%

1. viðgerð 5. desember 1994. Málið var beint í skattanevndina, sum 19. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. december 1994 og eftir 1. viðgerð tann 5. december 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevði fund tann 12. december 1994. Á hesum fundinum vóru umframt nevndarlimirnir, landsstýrismaðurin Jóannes Eidesgaard og umboð fyri Toll- og

Skattstovu Føroya.

Lógaruppskotini nr. 31 og 32 vórðu viðgjørd í sínu heild. Serliga var spurningurin um goldnar og tilskrivaðar rentur viðgjørdur.

Á fundi 14. december 1994 vóru umboð fyri:

1) Felagið fyri løggildar grannskoðarar.
Umboðini vístu á, at fyriliggjandi uppskot viðvíkjandi § 33, nr. 1) er ein broyting í prinsíppinum um, nær ein útreiðsla kann dragast frá. Tey hildu, at tað er skeivt at gjøgnumføra eina so radikala broyting, sum rakar øll feløg bert fyri at fyribyrgja, at nøkur fá feløg ikki skulu fáa ein órímiligan skattafyrimun. Ein annar vansi er, at nú danska roknskaparlógin er komin í gildi í Føroyum, førir ein broyting sum, ið uppskotin er við sær, at neyðugt verður at gera tveir heilt ymiskar roknskapir, ug ikki sum í dag, bert nakrar fáar reguleringar. Eisini verður tað trupult at avgera, nær rentan er goldin. Teir tóku ikki undir við uppskotinum.

2) Landsfelagið fyri sethúsaeigarar.
Umboð fyri felagið var á fundi og segði, at felagið tók undir við uppskotnu broytingunum um frádrátt fyri privatar rentuútreiðslur.

3) Føroya Arbeiðsgevarafelag.
Umboðini vístu á, at sambart fyriliggjandi uppskoti verður trupult at avgera, nær rentan er goldin. Eisini er skeivt at nýta gjaldskriteriið fyri eina einstaka útreiðslu, tá ið útreiðslukriteriið er tað vanliga. Eisini varð víst á, at rentur, ið virki tilskrívar sínum debitorum, skulu inntøkuførast beinanvegin, meðan virkið ikki kann draga tilsvarandi rentuútreiðslur frá, uttan at tær eru goldnar. Trupulleikar stinga seg eisini upp, tá eitt gjaldskriterium ikki er í samsvar við aðrar vinnulógir í Føroyum, og skattalógin kemur at eggja virkjum til heldur at gjalda bankanum rentur, enn t.d. at gjalda leverandørum ella MVG. Felagið tekur ikki undir við fyriliggjandi uppskoti, men mælir til, at prinsipiellur frádráttarrættur er fyri rentur, goldnar sum ógoldnar, tó soleiðis, at "rentueftirstøðan" verður avmarkað til eitt ár.

4) Umboð fyri Føroya Banka hava fráboðað støðu sína um fyriliggjandi uppskot skrivliga.
Bankin hevur ikki í løtuni tekniskan møguleika fyri generelt at boða frá, um tilskrivaðar rentur hjá teimum einstøku kundunum eisini eru goldnar. Eisini verður sagt, at Fíggjareftirlitið hevur álagt øllum peningastovnum at steðga við at inntøkuføra rentur, tá ið mett verður, at hesar ikki verða goldnar. Meginreglurnar fyri, nær rentan ikki kann metast at verða goldin, eru ásettar av Fíggjareftirlitinum. M.a. kunnu hesar nevnast: Gjaldssteðgur, debitor hevur latið inn umsókn um skuldarumskipan, ella tá tað eftir øllum líkindum má metast, at rentutilskrivingin førir samsvarandi størri tap við sær. Bankin metir, at av omanfyri nevndu skerpaðu mannagongd, sum bankin fylgir, er trupulleikin við rentum, ið verða tilskrivaðar, men ikki goldnar, væl minni í dag enn fyri t.d. 2-3 árum síðani.

5) Umboð fyri føroyskar fiskimenn við donskum fiskiskipum hava við skrivi fráboðað støðu teirra viðvíkjandi arbeiðsmarknaðargjaldinum, sum goldið verður í Danmark. Teir vísa á, at arbeiðsmarknaðargjaldið varð innført við gildi frá 1. januar 1994. Rætturin til ferðafrádrátt fór úr gildi 1. januar 1993. Teir hava víst á, at talan er um ein dupultskatt, sum skal javnast yvir tvískattasáttmálan, men fingu at vita, at hetta ikki var so, tá talan ikki er um skatt í hesum føri. Eftir fyriliggjandi uppskoti fáa føroyskir fiskimenn við donskum fiskiskipum frádrátt í Føroyum fyri ta upphædd, ið goldin verður í Danmark í arbeiðsmarknaðargjaldi. Heita verður galdandi frá 1. januar 1995.

Viðvíkjandi ferðafrádráttinum:
Út frá tí upphædd, sum er avsett á fíggjarlógini, kann ferðafrádrátturin í 1995 ikki verða av aðrari støddd enn tann, sum er tilskilaður í uppskotinum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meiritutin (Sune Jacobsen, Karl Robert Johansen, Vilhelm Johannesen og Finnbogi Ísakson) tekur undir við uppskotinum og mælir til, at tað verður samtykt við einstøkum broytingum, og setir fram soljóðandi

Broytingaruppskot

1) Í § 33 verður nr. 1) orðað soleiðis:
"Rentuútreiðslur av fløgu- og takstrarskuld í sambandi við vinnuvirki og útreiðslur til provisjón, stovningarprovisjón ella premiu í samband við lántøku ella ábyrgd til vinnuvirki. Frádráttur fyri rentuútreiðslur er tó treytaður av, at renturnar eru komnar til gjaldingar aftan á 31.12.1994. Rentuútreiðslur, sum eru komnar til gjaldingar í einum inntøkuári, og sum skattgjaldari hevur drigið frá, men ikki hevur goldið við endan av næstkomandi inntøkuári, verða inntøkuførdar fyri tað álmanakkaárið, renturnar eru komnar til gjaldingar. Rentuútreiðslurnar metast at verða goldnar, um so er, at tær av einum peningastovni, eru afturatskrivaðar kassakredittinum ella líknandi leypandi viðurskiftum, uttan at kredittturin hervið fer upp um hámarkið, sum avtalað varð pr. 1. januar í tí álmankkaárinum, ella við byrjan av

1) I § 33 affattes nr. 1) således:
"Renteudgifter af investerings- og driftsgæld i forbindelse med erhvervsvirksomheder og udgifter til provision, stiftelsesprovision eller præmie i forbindelse med optagelse af lån eller afgivelse af kaution til erhvervsvirksomheder. Fradrag for renteudgifter er dog betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31.12.1994. Renteudgifter, som er forfaldne til betaling et indkomstår, og som skatteyderen har fået fradrag for, men ikke har betalt i slutningen af næstkommende indkomstår, bliver indtægtsført for det kalenderår, de er forfaldne til betaling. Renteudgifterne anses for betalt, når de af et pengeinstitut tilskrives den skattepligtiges kassekredit eller lignende løbende mellemværende, uden at kreditten herved overstiger det maksimum, som er aftalt pr. 1. januar i det kalender-

roknskaparskeiðinum, sum kemur beint aftan á tað álmanakkaár ella roknskaparskeið, sum rentan varð tilskrivað.

2) Í § 33, nr., 11) verður sum nýtt 2. punktum innsett:

"Frádrátturin fyri tilfarskostnaðin má tó ikki verða størri enn lønarútreiðslurnar."

3) 2. punktum 2 verður hereftir 3. punktum.

4) Í § 46, stk. 2, verður 2. punktum orðað soleiðis:

"Frádráttur fyri rentur er tó treytaður av, at renturnar eru komnar til gjaldingar aftan á 31.12.1994."

5) Í § 46, stk. 2, verður sum nýtt 3. punktum innsett:

"Um rentuútreiðslur, sum eru komnar til gjaldingar, eru frádrignar í einum inntøkuári, ikki eru goldnar við endan av næstkomandi inntøkuári, verður álíkningin fyri inntøkuárið, rentuútreiðslurnar eru komnar til gjaldingar, broytt, soleiðis at rentufrádrátturin í skattinum verður minkaður við skattavirðinum av ikki goldnu rentunum.

6) 3. punktum verður hereftir 4. punktum.

7) Í § 46a, stk. 1, verður 2. punktum orðað soleiðis:

"Frádráttur fyri rentuútreiðslur er tó treytaður av, at renturnar eru komnar til gjaldingar aftan á 31.12.1994."

8) Í § 46 a, stk. 1, verður sum nýtt 3. punktum innsett:

"Um rentuútreiðslur, sum eru komnar til gjaldingar, eru frádrignar í einum inntøkuári, ikki eru goldnar við endan av næstkomandi inntøkuári, verður álíkningin fyri inntøkuárið, rentuútreiðslurnar eru komnar til gjaldingar broytt, soleiðis at rentufrádrátturin í skattinum verður minkaður við skattavirðinum av ikki goldnu rentunum."

år, eller i starten af regnskabsperioden, som kommer i forlængelse af det kalenderår eller regnskabsperiode, som renten blev tilskrevet."

2) I § 33, nr. 11) indsættes som nyt 2. punktum:

"Fradraget for materialeudgifterne må dog ikke være større end halvdelen af lønudgifterne."

3) 2. punktum bliver herefter 3. punktum.

4) I § 46, stk. 2, affattes 2. punktum således:

"Fradrag for renteudgifter er dog betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31. 12. 1994."

5) I § 46 indsættes som nyt 3. punktum:

"Såfremt renteudgifterne, der er forfaldne til betaling, og som er blevet foretaget i et indkomstår, ikke er betalt i slutningen af næstkommende indkomstår, bliver ansættelsen for indkomståret, hvori renteudgifterne er forfaldne, ændret således, at rentefradraget i skatten bliver formindsket med skatteværdien af de ikke betalte renter."

6) 3. punktum bliver herefter 4. punktum.

7) I § 46 a, stk. 1, affattes 2. punktum således:

"Fradrag for renteudgifter er dog betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31.12. 1994."

8) I § 46 a, stk. 1 indsættes som nyt 3. punktum:

"Såfremt renteudgifterne, der er forfaldne til betaling, og som er blevet fradraget i et indkomstår, ikke er betalt i slutningen af næstkommende indkomstår, bliver ansættelsen for indkomståret, hvori renteudgifterne er forfaldne, ændret, således at rentefradraget i skatten bliver formindsket med skatteværdien af de ikke betalte renter."

Meirilutin mælir til, at í viðmerkingunum til 1), 10) og 15) verður sett inn:

At ein rentuútreiðsla er goldin, merkir, at skattgjaldarin hevur rindað tað kravið, sum uppstendur móti honum, tá renturnar falla til gjaldingar. Hetta er galdandi uttan mun til, um skattgjaldarin fíggjar gjaldið við, at renturnar verða tilskrivaðar láninum, at nýtt lán verður tikið til at fíggja renturnar við, ella goldið verður kontant. Fyri vinnulívið er tó tann avmarking, at loyvt er ikki at draga rentur frá, sum eru goldnar við, at kassakredituri verður yvirtrektur.

Broytingin í mun til landsstýrisins uppskot er, at virki og einstaklingar kunnu skylda rentur í eitt ár, uttan at hetta ávirkar skattin.

Ein minniluti (Jørgen Niclasen), ið tekur undir við pørtum av uppskotinum, hevur hesar viðmerkingar til ymsu punktini:

Rentufrádráttur, vinnulígt/privat pkt. 1), 9), 12), 14) og 16.
Soleiðis, sum uppskot landsstýrisins er orðað, hevði tað verið til óbótaligan skaða fyri ein hóp av fólki og felløgum.

Fyri tann **vinnuliga partin** ætlaði landsstýrið at nokta felløgum at draga rentur frá, um tær ikki eru goldnar, meðan allar inntøkur og aðrar útreiðslur skulu bókast, um tær eru goldnar ella ikki.

Undir nevndarviðgerðini upplýsti Toll & Skattstovan, at um felløg fáa eina sanering, er hendan ikki skattskyldug. Hinvegin kann felag við rentuútreiðslum og øðrum útreiðslum hava standandi eitt hall áðrenn saneringina. Hetta hall kann felagið so draga frá í skatti av møguligum yvirskoti eftir saneringina. Tað er komið fyri, at tað er hesa órímiligheit, landsstýrið vil fyribyrgja við hesum lógaruppsskoti.

Trupulleikin við uppskoti landsstýrisins er, at hetta rakar meint hjá øllum felløgum, meðan landsstýrið bert ynskir at byrgja fyri nøkur einkult felløg, og tað er sera óheppið.

Við broytingaruppskoti meirilutans er hesin trupulleikin burtur. Toll & Skattstovan skal umsita lógina soleiðis, at henda lóg bert rakar tey felløg, hon er ætlað at raka.

Skattligu viðurskiftini við eina sanering í dag tykjast at hava broyting fyri neyðini. Hóast tað eru aðrir betri mátar at gera hetta upp á, tykist tað bert møguligt at fáa meiriluta fyri uppskotinum hjá meirilutanum. Hisini er broytingaruppskotið hjá meirilutanum í tráð við danska lóggávu á økinum.

Minnilutin mælir tí til at taka undir við broytingaruppsskoti meirilutans.

Viðvíkjandi **rentufrádráttinum hjá privatum**, er sami trupulleiki. Uppskot landsstýrisins straffar tey nógvu fyri at byrgja upp fyri teimum fáu.

Landsstýrið vil fyribyrgja, at ein, **ið ikki rindar sínar rentur**, skal fáa rentufrádrátt. Løgtingið hevur álagt landsstýrinum at loysa ovurstóra sethúsatrupulleikan, men í staðin leggur landsstýrið fram uppskot, sum ger ilt verri fyri sethúsaeigarar.

Nú hevur Føroya Banki undir nevndarviðgerðini upplýst, at fíggjareftirlitið hevur álagt øllum peningastovnum at steðga við at tilskriva rentur, tá ið mett verður, at hesar ikki verða goldnar, og tí skuldu trupulleikin við rentufrádráttinum verið burtur.

Meirilutin í skattanevndini vil tó tryggja seg við einum broytingaruppskoti, har rentan skal verða goldin í árinum eftir, at hon er tilskrivað fyri at verða loyvd at draga frá. Hetta uppskot tykist rímuligari.

Hetta er ein eykatrygd, umframt nýggju meginregluna, peningastovnarnir nýta.

Út frá tí, at Toll- og Skattstovan umsitur hesa lóg, so hon bert rakar tey, hon er ætlað at raka, tekur minnilutin undir við broytingaruppskoti meirilutans.

Minnilutin minnir samstundis landsstýrið á samtykta uppskot fólkafloksins, har løgtingið hevur álagt landsstýrinum at loysa sethúsatrupulleikan.

Avtøka av kautiónsfrádráttinum, pkt. 2), 3) og 4):
Um landsstýrið ynskir at føra ein vinnuskapandi politikk, hevur landsstýrið við at avtaka kautiónsfrádráttin fullkomiliga misskilt sína uppgávu.

Tað sindrið av fløguhugi og "risikovilligum" persónum, ið enn eru eftir, verða við hesum enn færri.

Heldur enn at gera ilt verri, átti landsstýrið at gjørt lóg fyri kautiónum, so sleppast kann undan mannalagnu, har persónar missa alt umframt at gerast skuldarbundnir so leingi, teir liva av einum ófrávikiligum kautiónskravi frá peningastovni. Eru tá tílíkar mannalagnur, landsstýrið vil sleppa undan, eigur landsstýrið heldur at fáa lóg um reglur fyri kautiónum, har kautiónskrøvini skulu verða rímilig. Tílíkt uppskot fyribyrgir eisini stórum kautiónsfrádráttum fyri landskassan.

Minnilutin mælir frá at samtykkja uppskot landsstýrisins, men setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri løgtingið lógaruppskot um reglur fyri kautiónum.

Avtøka av rentumótrokning, umvælingar- og ferðafrádráttur og broyting av 12

mánaðarskeið fyri skattgjaldarar, ið arbeiða uttanlands, pkt. 6), 7), 8), 10) og 15).

Hesin parturin av uppskoti landsstýrisins eru alt broytingar tann rætta vegin Ynskiligt hevði verið at gjørt ferðafrádráttin á hædd við tað, hann var, men soleiðis, sum landsstýrið hevur lagt fíggjarkarmarnar, er hetta neyvan møguligt nú.

Minnilutin mælir tí til at samtykkja hendan partin av uppskoti landsstýrisins.

Arbeiðsmarknaðargjaldið, ið goldið verður í Danmark, pkt. 17).
Hetta arbeiðsmarknaðargjald er álagt føroyskum fiskimonnum, ið sigla við dønskum skipum, og er tað álagt frá 1. januar 1994 og er 5% í 1994, hækkar síðan við 1% um árið til 8% í 1998.

Landsstýrið hevur við hesum uppskoti ásannað, at hetta gjald er at skilja sum skattur og skal tí kunna dragast frá í føroyska skattinum. Tað løgna er, at landsstýrið setir frádráttin í gildi frá 1. januar 1995, hóast gjaldið var álagt frá 1. januar 1994. Hetta tykist órímiligt, og setir minnilutin tí fram broytingaruppskot um, at frádráttirin kemur í gildi frá 1. januar 1994.

Minnilutin tekur undir við uppskotinum, men setir fram í gildisreglunum soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 2 verður skoytt uppí: "17) fær gildi frá 1. januar 1994."	Til § 2 tilføjes: "17) træder i kraft fra 1. januar 1994."

Toll- og Skattstovan hevur upplýst, at henda broyting kostar landskassanum kr. 450.000 í 1994. At henda upphædd er so lítil, er tí, at so nógvir sjómenn við útlendskum skipum eru tvingaðir at flyta grundað á føroyska skattin, meðan fleiri aftural hava í umbóna at flyta eisini. Teir skulu rinda til ALS, men fáa ikki eitt oyra, um teir gerast arbeiðsloysir, og teir skulu rinda høgan skatt, men fáa ikki inntøkutrygd og í neyðstøðu ikki eitt oyra frá Almannastovuni. Sjómenn uvbyrðaðir av skyldum, men við ongum rættindum kunnu ikki væntast at vera verandi. Teir eru í útlandinum, men um teir eru skrásettir í Føroyum, gjalda teir nógv hægri skatt enn, um teir flyta t.d. til Danmarkar.

Hetta er sama gongdin, sum við hondverkarum, ið arbeiddu í útlandinum áðrenn skattingin av teimum var broytt.

Henda flyting má steðgast, um landskassin skal gera sær vón um at fáa nakað frá hesum monnum. Hetta gerst bert við at broyta skattingina av hesum sjómonnum, so hon er nøkunlunda í samsvar við tað, teir verða skattaðir aðrastaðni, og so at skattalógin ikki

tvingar teir at flyta.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri løgtingið uppskot sum ger, at skattalógin ikki tvingar sjómenn, ið sigla við útlendskum skipum, at flyta av landinum.

2. viðgerð 21. desember 1994. Uppskotið sum broytt av meirilutanum samtykt við 21-0 atkvøðum. Broytingaruppskot minnilutans fall við 5-0 atkvøðum. Uppskot minnilutans til samtyktar fullu við ávikavist 7-0 og 14-0 atkvøðum.

2. januar 1995 løgdu limir í skattanevndini fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Limir í skattanevndini (Sune Jacobsen, Karl Robert Johansen, Vilhelm Johannesen og Finnbogi Ísakson) seta fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til 3. viðgerð

1) Í § 5 verður stk. 5 strikað.
2) Stk. 6 verður hereftir stk. 5
3) Í § 33 verður skoytt upp í nr. 1:
"Landsstýrið kann við kunngerð áseta neyvari reglur fyri, hvat er at skilja við, at rentan er goldin."
4) § 33, nr. 11, verður orðað soleiðis:
"Frádrátturin fyri helvtina av tilfarskostnaðinum má tó ikki verða størri enn frádrátturin fyri lønarútreiðslunum."
5) Í § 2 verður eftir nr. 6 sett:
"7) fær gildi frá 1. januar 1994."

1) I § 5 udgår stk. 5.
2) Stk. 6 bliver herefter stk. 5.
3) I § 33 tilføjes til nr. 1:
"Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for, hvorledes det, at renten er betalt, skal forstås."
4) § 33, nr. 11, affattes således:
"Fradraget for halvdelen af materialeudgifterne må dog ikke være større end fradraget for lønudgifterne."
5) I § 2 indsættes efter nr. 6:
"7) træder i kraft fra den 1. januar 1994."

Broytingin í § 5, stk. 5, er ein lógarteknisk broyting og stendst af, at mótrokningin

millum rentuútreiðslur og rentuinntøkur verður avtikin. Broytingin er av misgávu ikki komin við í fyrsta umfari. Broyting nr. 2 er bert ein fylgibroyting av nr. 1.

Í § 33, nr. 1, verður innsett, at landsstýrið við kunngerð kann áseta neyvari reglur fyri, hvat er at skilja við, at rentan er goldin. Hetta kemst av, at tað kunnu koma trupulleikar seinni, sum ikki er tikin hædd fyri í lógartekstinum.

Ásett er, at rentuútreiðslurnar metast at verða goldnar, um so er, at tær av einum peningastovni eru afturatskrivaðar kassakredittinum ella líknandi leypandi viðurskiftum, uttan at kreditturin hervið fer upp um hámarkið. Við hámarkið skilst eisini loyvt trot og aðrar seravtalur millum peningastovnar og kunda, sum tó ikki mugu verða gjørdar við tí endamáli at gjalda rentur við.

Broytingin í § 33, nr. 11, skal skiljast soleiðis:
Um ein skattgjaldari, t.d. umvælir síni hús, og hann av hesum hevur lønarútreiðslur upp á 5.000 kr. og tilfarskostnaðurin er 15.000 kr., verður frádrátturin hesin:

Frádrátturin fyri lønarútreiðslur	5.000 kr.
frádráttur fyri tilfarskostnaðin	
½ av tilfarskostn. = 7.500 kr. javnað til	5.000 kr.
	10.000 kr.

Broytingin, viðvíkjandi nær § 33, nr. 12 skal verða galdandi frá, stendst av, at t.d. persónar, sum koma undir hesar reglur, men fara avstað í nov. 1994, ikki hava møguleika at nýta frádráttin, av tí at teir ikki lúka treytirnar um at vera burturstaddir í 2 mánaðir uttan slit, ella í minsta lagi 100 samdøgur innan fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið.

3. viðgerð 2. januar 1995. Broytingaruppskotið samtykt við 24-0 atkvøðum. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

Lóg nr. 4 frá 12. januar 1995.

32 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1994, fríggjadagin 2. desember 1994 legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan</u>.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:

"**§ 1.** Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d, e og f í somu lóg, til landskassan ásettur soleiðis:

Er inntøkan minni enn 22.500 kr., verður latið 0 %

<u>lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen</u>.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1 affattes således:

"**§ 1.** Under henvisning til § 54 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer udskrives skatten for dem, der er omhandlet i § 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d,e og f i samme lov, til landskassen således:

Er indtægten mindre end 22.500 kr., erlægges 0 %

Er inntøkan Er indtægten kr.	men minni enn men mindre end kr.	verður latið erlægges kr.	av af kr.	og av restini og af resten %
22.500	60.000	0	22.500	15,0
60.000	140.000	5 625	60.000	31,0
140.000	220.000	20.425	140.000	36,5
220.000	300.000	59.625	220.000	40,0
300.000		91.625	300.000	44,0

2) Í § 3, stk. 2 verða hesar broytingar gjørdar:

2) I § 3, stk. 2 foretages disse ændringer:

"frá og við inntøkuárinum 1993" verður broytt til: "frá og við inntøkuárinum 1995" og "6.600 kr. fyri hvønn" verður broytt til: "7.400 kr. fyri hvønn".

3) Í § 3, stk. 3 verða hesar broytingar gjørdar:
"frá og við inntøkuárinum 1993" verður broytt til: "frá og við inntøkuárinum 1995" og "9.800 kr." verður broytt til: "10.600 kr.".

4) Í § 4, stk. 1 verða hesar broytingar gjørdar:
"nettorentuupphæddini, uppgjørd sambært stk. 2-4 í hesi §" verður broytt til: "rentuupphæddini" og "nettorentuupphædd" verður broytt til: "rentuupphædd".

5) Í § 4 verður í stk. 1 sum nýtt pkt. 2 sett:
"Frádráttur fyri rentuútreiðslur er tó treytaður av, at renturnar eru komnar til gjaldingar aftaná 31.12.1994 og eru goldnar viðkomandi skattaár".

6) 2. pkt. verður hereftir 3. pkt.

7) Í § 4 verða stk. 2, 3 og 5 strikað.

8) Stk. 4 verður hereftir stk. 2.

9) Í § 4, stk. 4 verður 1. pkt. orðað soleiðis:
"Skattskyldug hjún, sum búgva saman, gera sjálvi av, hvussu samlaða rentuupphæddin sambært stk. 1 skal verða býtt teirra millum."

10) Í § 4 a verður stk. 1 orðað soleiðis:
"Við gildi frá 18. januar 1991 er hinum skattskylduga loyvt at draga frá í útroknaða landsskattinum í mesta lagi 27 % av 60.000 kr. - skattskyldug hjún, sum búgva saman, tó í mesta lagi 27 % av samanløgdum 120.000 kr. - av rentum av privatari skuld og útreiðslum til provisjón, stovningarprovisjón ella premiu í samband við privata lántøku, sum avtalað er 18.

"fra og med indtægtsåret 1993" ændres til: "fra og med indtægtsåret 1995" og "6.600 kr. pr. person" ændres til: "7.400 kr. pr. person".

3) I § 3, stk. 3 foretages disse ændringer:
"fra og med indtægtsåret 1993" ændres til: "fra og med indtægtsåret 1995" og "9.800 kr." ændres til: "10.600 kr.".

4) I § 4, stk. 1 foretages disse ændringer:
"nettorentebeløbet, opgjort i henhold til stk. 2-4 i denne §" ændres til: "rentebeløbet", og "nettorentebeløb" ændres til: "rentebeløb".

5) I § 4 indsættes i stk. 1 som nyt pkt. 2:
"Fradrag for renteudgifter er dog betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31.12.1994 og er betalt i vedkommende skatteår".

6) Pkt. 2 bliver herefter pkt. 3.

7) I § 4 slettes stk. 2, 3 og 5.

8) Stk. 4 bliver herefter stk. 2.

9) I § 4, stk. 4 affattes pkt. 1 således:
"Samlevende ægtefæller, der er skattepligtige, afgør selv, hvorledes det jfr. stk. 1 opgjorte samlede rentebeløb skal fordeles mellem dem."

10) I § 4 a affattes stk. 1 således:
"Med virkning fra 18. januar 1991 kan den skattepligtige fratrække renter af privat gæld og udgifter til provision, stiftelsesprovision eller præmie i forbindelse med privat låntagning, som er aftalt 18. januar 1991 eller senere, til køb eller opførelse af egen bolig, til istandsættelse og ombygning af egen bolig, til uddannelseslån og lån til betaling af afgiven kaution i henhold til § 33, nr. 2) i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med

januar 1991 ella seinni, til keyp ella bygging av egnum bústaði, til umvæling og umbygging av egnum bústaði, til útbúgving og til gjalding av ábyrgd sambært § 33, nr. 2) í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, um so er, at ábyrgdin er avtalað áðrenn 3. desember 1994. Frádráttur fyri rentuútreiðslur er tó treytaður av, at renturnar eru komnar til gjaldingar aftaná 31.12.1994 og eru goldnar viðkomandi skattaár."

11) § 4 b verður strikað.

12) Í § 5, stk. 2 verður "22 % " broytt til: " 27 %".

§ 2

Hetta lóg fær gildi frá 1. januar 1995, tó koma fylgjandi broytingar í gildi soleiðis:

10) fær gildi frá og við 3. desember 1994 fyri lán, ið eru tikin til gjalding av ábyrgd, sum er avtalað 3. desember 1994 og framyvir.

12) fær gildi fyri tey nevndu felløg, sum við endan av roknskaparskeiði teirra, ið fellur saman við, ella endar í álmanakkaárinum 1994 ella seinni, hava ein partapening, ábyrgdarpening ella lutapening uppá 300.000 kr. ella meira.

senere ændringer, såfremt kautionen er aftalt før den 3. desember 1994, i den udregnede landsskat med højst 27 % af 60.000 kr. - samlevende ægtefæller dog med højst 27% af sammenlagt 120.000 kr. Fradrag for renteudgifter er betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31.12.1994 og er betalt i vedkommende skatteår."

11) § 4 b udgår.

12) I § 5, stk. 2 ændres "22 %" til: "27%".

§ 2

Denne lov træder i kraft 1. januar 1995, dog træder følgende ændringer i kraft således:

10) træder i kraft fra og med 3. desember 1994 for lån, som er optaget til dækning af kaution, som er aftalt 3. desember 1994 eller fremover.

12) træder i kraft for de nævnte selskaber, som ved slutningen af deres regnskabsperiode, der falder sammen med eller slutter i kalenderåret 1994 eller senere, har en aktie- eller andelskapital på 300.000 kr. eller mere.

Viðmerkingar:

Skattastigin 1).

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broyting í ásetingarlógini, er ein lækking av skattastiganum.

Verandi samgonga var samd um, at 28 mió. kr. skuldu berast aftur til skattgjaldaran, og hetta samsvarar nøkunlunda til tann eykaskattin, sum var álagdur við løgtingslóg nr. 91 frá 5. juni 1992 og 194 frá 10. desember 1993.

Skattastigin verður broyttur soleiðis, at skatturin av inntøku

millum kr. 140.000,- og kr. 220.000,- lækkaðar við 3,5%
millum kr. 220.000,- og kr. 300.000,- lækkaðar við 5%
og inntøkur yvir 300.000,- lækkaðar við 7%

Omanfyrinevnda lækking av skattastiganum/progressiónini er mett at geva landskassanum meirútreiðslu uppá umleið 28 mió. kr.

Skattahámarkið verður í 1995 lækkað úr 57% í 55% sambært § 2, stk. 2 í løgtingslóg nr. 194 frá 10. desember 1993 um landsskatt og kommunuskatt, um ikki annað verður áskett við lóg.

Botnfrádrátturin av pensiónum 2), 3).

Hækkingin av botnfrádráttinum hjá pensiónistum, umfatar teir bólkar av pensiónistum, ið eru nevndir í § 3 í Áskotingarlógini. Nevniliga persónar, ið eru 67 ár ella eldri, Avlamis-, einkju- ella fólkapensiónistar ella teir, ið fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini.

Pensjónsgrundupphæddin er ídag:

	Um mánaðin	Árliga
Giftur pensjónistur	3.164	37.968
Stakur pensjónistur	3.982	47.784

Persónfrádrátturin hjá pensjónistum er ídag:

	Árliga
Giftur pensjónistur	6.600
Stakur pensjónistur	9.800

Persónfrádrátturin ger tað, at pensjónistar ikki skulu gjalda skatt til landskassan av grundupphæddini, men bert skat til kommununa, í teimum førum sum kommunuskatta-

prosentið er størri enn 20.

Við at hækka persónfrádráttin við 800,- kr. hjá báðum bólkunum, kemur ein stórur partur av pensjónistunum ikki at gjalda skatt av grundupphæddini.

Hækkingin fer at kosta landskassanum umleið 5,9 mió. kr.

Skatta-prosent	Giftur	Stakur	
16,0	0	0	
17,0	0	0	
18,0	0	0	
19,0	0	0	
19,9	64	284	Tórshavn
21,0	349	677	Sumba
22,0	608	1.034	Sandavágur
23,0	867	1.391	Oyndarfjørður

Mótrokningin millum rentuútreiðslur og rentuinntøkur 4), 7), 9), 11).

Fyriliggjandi uppskot ásetur, at reglurnar fyri mótrokning millum rentuútreiðslur og rentuinntøkur, áðrenn rentuútreiðslurnar kunnu dragast frá í skattinum skulu avtakast. Eftir uppskotnu broytingunum fer tað framyvir ikki at hava týdning fyri frádráttarrætt fyri rentuútreiðslurnar, hvussu stóra rentuinntøku viðkomandi skattgjaldari hevur av innistandandi.

Grundgevingin fyri at taka hesar reglur av er, at málið fyri hesar reglur er nátt. Málið var at steðga tí rentuspekulatión sum tók seg um, í árinum upp til 1991.

Ein rentuskattur uppá 22% og eitt fíggjarognaravgjald uppá 1,9%, hava verið við til at gjørt slíkar rentuspekulatiónir óaktuellar.

Privatar rentuútreiðslur 5), 10).

Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg áseting av skatti til landskassan er ein "uppstramman" av reglunum um frádrátt fyri privatar rentuútreiðslur.

Fyriliggjandi uppskot ásetur, at rentuútreiðslur skulu vera komnar til gjaldingar og verða goldnar, fyri at skattgjaldari kann fáa frádrátt fyri hesar. Eftir uppskotnu broytingunum vil hetta bera við sær, at t.eks. skattgjaldari, sum hevur húsalán, men ikki er førur fyri at gjalda rentur og avdrøg, ikki kann draga rentuútreiðslurnar frá, fyrr enn hann hevur goldið hesar.

Uppskotna broytingin skuldi verið við til, at byrgt fyri, at t.d. ein húsaeigari kemur í óføri, um hann dregur rentuútreiðslur, sum hann ikki hevur goldið, frá, og av hesum fær ein eykaskatt tá skattaárið er farið.

Fyriliggjandi uppskot ásetur eisini, at ein skattgjaldari, sum avtalar ábyrgd framløgudagin ella seinni, og um kautiónin verður effektiv, tekur lán fyri at gjalda hana, ikki kann fáa frádrátt fyri rentuútreiðslurnar, sum standast av hesum láni.

Partafelagsskattur 12).

Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan viðvíkur hækking av skattaprosentinum hjá partafeløgum v.m., sum hava ein partapening ella lutapening, sum er 300.000 kr. ella meira.

Fyriliggjandi uppskot ásetur, at partafeløg v.m., sum við endan av tí roknskaparskeiði, sum fellur saman við ella endar í 1994, hava partapening ella lutapening, sum er 300.000 kr. ella meira, verða skattað við einum prosenti uppá 27 móti 22% í galdandi lóg.

Eftir uppskotnu broytingunum verður partafelagsskatturin fyri partafeløg, har partapeningurin er 300.000 kr. ella meira, hereftir hesin:

Partafelagsskattur	27 %	27%
Vinningsbýtisskattur	35 % av 73	25,55 %
		52,55 %

Eftir verandi reglum er skatturin hesin:

Partafelagsskattur	22 %	22 %
Vinningsbýtisskattur	35 % av 78	27,3 %
		49,3 %

Fyri partafeløg, sum hava ein partapening, sum er minni enn 300.000 kr., verður skattaprosentið uppá 49 ikki broytt. Partafelagsskatturin fyri hesi feløg er hesin:

Partafelagsskattur	49 %	49 %
Vinningsbýtisskattur	35 % av 51	17,85 %
		66,85 %

1. viðgerð 5. desember 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 19. desember

1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. december 1994 og eftir 1. viðgerð tann 5. december 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevði fund tann 12. december 1994. Á hesum fundinum vóru umframt nevndarlimirnar landsstýrismaðurin Jóannes Eidesgaard og umboð fyri Toll- og Skattstovu Føroya.

Nevndin hevur viðgjørt hetta løgtingsmál saman við løgtingsmáli nr. 31/1994 og vísir til álitið í tí málinum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Karl Robert Johansen, Vilhelm Johannesen og Finnbogi Ísakson) tekur undir við uppskotinum og mælir til, at tað verður samtykt við einstøkum broytingum, og setir fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 4, stk. 1, verður pkt. 2 orðað soleiðis:
"Frádráttur fyri rentuútreiðslur er tó treytaður av, at renturnar eru komnar til gjaldingar aftan á 31.12.1994."

2) Í § 4, stk. 1, verður sum nýtt pkt. 3 sett:
"Um rentuútreiðslur, sum eru komnar til gjaldingar, eru frádrignar í einum inntøkuári, ikki eru goldnar við endan av næstkomandi inntøkuári, verður álíkningin fyri inntøkuárið, rentuútreiðslurnar eru komnar til gjaldingar, broytt soleiðis, at rentufrádráttur í skattinum verður minkaður við skattavirðinum av ikki goldnu rentunum.

1) I § 4, stk. 1, affattes 2. pkt. således:
"Fradrag for renteudgifter er dog betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31.12.1994."

2) I § 4 indsættes som nyt pkt. 3:
"Såfremt renteudgifterne, der er forfaldne til betaling, og som er blevet fradraget i et indkomstår, ikke er betalt i slutningen af næstkommende indkomstår, bliver ansættelsen for indkomståret, hvori renteudgifterne er forfaldne ændret, således at rentefradraget i skatten bliver formindsket med skatteværdien af de ikke betalte renter."

3) 3. pkt. bliver herefter 4. pkt.

4) I § 4 a, stk. 1 affattes 2. pkt. således:

3) Pkt. 3 verður hereftir pkt. 4.

4) Í § 4 a, stk. 1, verður pkt. 2 orðað soleiðis:

"Frádráttur fyri rentuútreiðslur er tó treytaður av, at renturnar eru komnar til gjaldingar aftan á 31.12.1994.

5) Í § 4 a, stk. 1, verður sum nýtt pkt. 3 sett:

"Um rentuútreiðslur, sum eru komnar til gjaldingar, eru frádregnar í einum inntøkuári, ikki eru goldnar við endan av næstkomandi inntøkuári, verður álíkningin fyri inntøkuárið, rentuútreiðslurnar eru komnar til gjaldingar, broytt soleiðis, at rentufrádráttur í skattinum verður minkaður við skattavirðinum av ikki goldnu rentunum."

6) Í § 2 í fyriliggjandi uppskoti verður 12) orðað soleiðis:

"Fær gildi frá roknskaparskeiðinum, sum fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum 1995. Reglurnar umfata tey nevndu felløg, sum í roknskaparskeiði teirra, ið fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum 1995, hava ein partapening, ábyrgdarpening ella lutapening upp á 80.000 kr. ella meira."

"Fradrag for renteudgifter er dog betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31.12.1994."

5) I § 4 a, stk. 1, indsættes som nyt pkt. 3:

"Såfremt renteudgifterne, der er forfaldne til betaling, og som er blevet fradraget i et indkomstår, ikke er betalt i slutningen af næstkommende indkomstår, bliver ansættelsen for indkomståret, hvori renteudgifterne er forfaldne, ændret, således at rentefradraget i skatten bliver formindsket med skatteværdien af de ikke betalte renter."

6) I § 2 i det fremsatte forslag affattes 12) således:

"træder i kraft fra den regnskabsperiode, som er sammenfaldende med eller slutter i kalenderåret 1995. Reglerne omfatter de nævnte selskaber, som i slutningen af deres regnskabsperiode, der er sammenfaldende med eller slutter i kalenderåret 1995 har en aktiekapital, garantikapital eller andelskapital på 80.000 kr. eller mere."

Nevndin mælir til, at í viðmerkingunum til 5) og 10) verður sett:
At ein rentuútreiðsla er goldin merkir, at skattgjaldarin hevur rindað tað kravið, sum uppstendur móti honum, tá renturnar falla til gjaldingar. Hetta er galdandi uttan mun til, um skattgjaldarin figgjar gjaldið við, at renturnar verða tilskrivaðar lánunum, at nýtt lán verður tikið til at fíggja renturnar við, ella goldið verður kontant. Fyri vinnulívið er tó tann avmarking, at loyvt er ikki at draga rentur frá, sum eru goldnar við, at kassakreditturin verður yvirtrektur.

Broytingin í mun til landsstýrisins uppskot er, at virki og einstaklingar kunnu skylda rentur í eitt ár, uttan at hetta ávirkar skattin.

Minnilutin (Jørgen Niclasen), ið tekur undir við pørtum av uppskotinum, hevur hesar viðmerkingar til ymsu punktini.

Skattastigin pkt. 1)
Uppskot landsstýrisins, sum fólkaflokkurin í løgtingsmáli nr. 39/1994 hevur skotið upp, er ein skattabroyting, sum munar og stimbrar. Men ásannandi, at tað kann henda, at uppskot fólkafloksins fellur, tekur minnilutin undir við uppskoti landsstýrisins.

Botnfrádrátturin av pensiónum og mótrokning millum rentuútreiðslur og -inntøkur pkt. 2), 3), 4), 7), 9) og 11)
Minnilutin mælir til at samtykkja hendan partin av uppskoti landsstýrisins.

Privatar rentuútreiðslur pkt. 5 og 10)
Vísandi til viðmerkingar minnilutans í álitinum til løgtingsmál nr. 31/1994 tekur minnilutin undir við broytingaruppskoti meirilutans.

Partafelagsskattur pkt. 12)
Tá talan er um partafelagsskatt, er alt avgerandi at hava stabil og rímilig viðurskifti. Tá partafelagsskatturin seinast varð broyttur, varð hesin lækkaður úr 49% niður í 22%, meðan skattur av vinningsbýti varð hækkaður.

Henda broyting var ætlað til framburð og eisini ætlað at vera stabil. Tað vísti seg eisini, at hóast eina stóra lækking í partafelagsskattinum, so hækkkaði partafelagsskattainntøkurnar hjá landskassanum.

Ætlaða hækkingin hjá landsstýrinum úr verandi 22% upp í 27% kann føra við sær óhepnar avleiðingar. Trúvirðið og stabilitetur koma undir hart trýst. Hugsar landsstýrið um ein vinnusskapandi politikk, er henda ætlan ein bjarnatænasta fyri landskassan. Grundin til, at partafelagsskattur skal vera lágur, er fyri at feløgini skulu behalda yvirskot sum likviditet til at víðka um virksemið. Ongantíð fyrr hevur hesini likviditetur verið so umráðandi sum nú við verandi peningastovnum.

Undanførslan fyri hesi hækking um, at londini, vit hava dupultskattaavtalur við, krevja ein partafelagsskatt upp á 27%, er ikki annað enn undanførsla. Verandi partafelagsskattur upp á 22% er reistur í norðurlendskum høpi, og har góðtóku øll norðanlondini henda skatt uttan Danmark. At danir halda, at vit gjalda ov lítið í skatti, er ikki nakað nýtt, so her er bert ein spurningur um insats frá landsstýrinum at fáa danir at góðtaka ein partafelagsskatt upp á 22%. Hetta skuldi ikki verið so ringt, tá øll hini norðanlondini hava góðtikið 22%.

Sum krúnan á verkinum ætlar landsstýrið at seta hesa hækking í verk við 2 ára afturvirkandi kraft. Frægari hevur meirilutin skotið upp broytingaruppskot, har tað verður við eitt ára afturvirkandi kraft. Tað kann ikki verða rætt, at løgtingið samtykkir eina skattahækking við afturvirkandi kraft.

Minnilutin mælir frá at samtykkja uppskot landsstýrisins, men verður uppskotið samtykt, mælir minnilutin til, at løgtingið nýtir góðan tingsið og ikki setir eina skattahækking í gildi við afturvirkandi kraft.

Minnilutin tekur undir við broytingaruppskoti meirilutans burtursað frá gildiskomuni, og setir minnilutin tí fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 2 í fyriliggjandi uppskoti verður 12) orðað soleiðis:
"fær gildi frá roknskaparskeiðinum, sum byrjar í álmanakkaárinum 1995. Reglurnar umfata tey nevndu felløg, sum í roknskaparskeiði teirra, ið byrja í álmanakkaárinum 1995, hava ein partapening, ábyrgdarpening ella lutapening upp á 80.000 kr. ella meira."

I § 2 i foreliggende forslag formuleres 12) således:
"får gyldighed fra regnskabsperioden der begynder i kalenderåret 1995. Reglerne omfatter de nævnte selskaber som i deres regnskabsperiode der begynder i kalenderåret 1995 har en selskabskapital, ansvarlig indskudskapital eller andelskapital på kr. 80.000 eller mere."

Finnbogi Ísakson ger hesar viðmerkingar: Skattatrýstið í Føroyum er høgt. Gjøld til ALS og Tann Samhaldsfasta og nógv hækkaður kommunuskattur hava økt um byrðarnar hjá tí einstaka skattgjaldaranum. Landsskatturin er ikki hækkaður og er t.d. lægri í 1994, enn hann var fyri 6 árum síðani. Tó varð ein eykaskattur lagdur á tær høgu og hægstu inntøkurnar í 1994 eins og árini frammanundan, men nakað hægri.

Í fyriliggjandi uppskoti mælir landsstýrið til, at skatturin verður lækkaður, serliga á teimum høgu inntøkunum. Skattastigin verður broyttur frá inntøkum upp á 140.000 kr. og uppeftir.

Útrokningar frá Toll- og Skattstovuni vísa, at ein inntøka upp á 180.000 kr. fær 1.400 kr. árliga í skattalætta ella 117 kr. um mánaðin. Ein inntøka upp á 250.000 kr. fær 4.300 kr. árliga í skkattalætta (358 kr. um mánaðin). Ein inntøka upp á 300.000 kr. fær árliga 6.800 kr. í skattalætta (567 kr. um mánaðin). Ein inntøka upp á 400.000 kr. fær árliga 13.800 kr. í skattalætta (1150 kr. um mánaðin).

Mett verður, at hesin skattalætti fyri tær hægru inntøkurnar fer at kosta landskassanum 28 mió. kr. í 1995.

Ein onnur broyting er, at boinfrádrátturin hjá pensjónistum verður broyttur, so at pensjónistar gerast skattafrír í teimum kommunum, sum hava eitt kommunuskattaprosent upp á 20% ella minni.

Minnilutin ásannar, at skattatrýstið í Føroyum sum heild er ov høgt, og at tað gagnar bæði tí einstaka og samfelagnum sum heild, at skattatrýstið verður lækkað. Tó heldur

minnilutin tað ikki vera rætt bert at taka einstakar bólkar burturúr. Heldur átti skattalættin at umfata allar inntøkubólkar. Havandi í huga, at kravið til játtanir á fíggjarlógini er 200.000 kr. minni í 1995 enn í 1994, heldur minnilutin, at útvegir áttu at verið fyri at lækka skattatrýstið fyri 80-100 mió. kr., so at allir inntøkubólkar kunnu fáa ein munagóðan lætta.

Eftir fyriliggjandi uppskoti verður partafelagsskatturin eisini broyttur. Skattanevndin skjýtur upp, at partafeløg og smápartafeløg verða skattað eins í framtíðini, t.v.s. at vinnufeløg, sum hava 80.000 kr. ella meira í partapeningi, gjalda 27% í skatti. Hesum er minnilutin samdur í.

Við hesum viðmerkingum mælir minnilutin tinginum til at samtykkja uppskotið við teimum broytingum, sum skattanevndin mælir til.

2. viðgerð 21. desember 1994. Málið samtykt við 22-0 atkvøðum.

21. desember 1994 løgdu tingmenninir Sune Jacobsen, Karl Robert Johansen, Jørgen Niclasen, Vilhelm Johannsen og Finnbogi Ísakson fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð

Í álitinum til løgtingsmál nr. 32/1994 er broytingaruppskot til § 2, 12) í fyriliggjandi uppskoti landsstýrisins.

§ 2, 12) er gildiskomunarreglurnar fyri partafelagsskattin. Av tí at markið uppá 300.000 kr. eisini stendur í skattalógini § 5, stk. 2, verður markið eisini at broyta í sjálvari lógini.

§ 1, 12 verður orðað soleiðis:

12) Í § 5 verður stk. 2 orðað soleiðis:

"Hjá partafeløgm, smápartafeløgum, sparikassum og lutafeløgum, sum nevnd eru í stk. 1 og sum hava partapening, ábyrgdarpening ella lutapening, sum er 80.000 kr. ella meira verður skatturin ásettur til 27% av inntøkunum til landskassa og kommunur".

§ 1, 12 affattes således:

12) I § 5 affattes stk. 2 således:

"For aktieselskaber, anpartsselskaber, sparekasser og andelsselskaber, der er nævnt i stk. 1, og som har en aktiekapital, garantikapital eller andelskapital på 80.000 kr. eller mere, udskrives skatten til 27% af indtægten til landskasse og kommune".

3. viðgerð 22. desember 1994. Broytingaruppskotið samtykt við 31-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

Lóg nr. 2 frá 3. januar 1995.

33 Broyting í løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald

Ár 1994, fríggjadagin, 2. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 192 frá 10. desember 1993 um renutavgjald og fíggjarognaravgjald verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2.** Avgjaldsskyldan eftir hesi lóg fevnir um:

1) Ogn, ið er innistandandi á konti í føroyskum peningastovnum og postgiro, eftirlønarskipanir í føroyskum peningastovnum samb. §§ 1C og 1D í rentutryggingarlógini, lívstryggingar og eftirlønarskipanir í føroyskum tryggingarfelag samb. §§ 1, 1A og 1B í rentutryggingarlógini.
2) Ognarvinningur av ogn, ið er innistandandi á konti í útlendskum peningastovnum, herundir eisini ognarvinningur av eftirlønarskipanum samb. §§ 1C og §1D í rentutryggingarlógini.
3) Virðisbrøv sbr. § 1 í Virðisbrævaskattalógini.

   Undantikin eru tó:

   a) partabrøv og lutaprógv í felløgum, skráset í Føroyum, sbr. § 1 nr. 8 í skattalógini,
   b) føroysk lánsbrøv,
   c) pantibrøv og onnur skuldarbrøv, ið eru útskrivað í sambandi við kundaútlán hjá fíggingarstovni

lagtingslov om ændring i lagtingslov om renteafgift og afgift af finansielle aktiver.

§ 1

I lagtingslov nr. 192 af 10. december 1993 om renteafgift og afgift af finansielle aktiver foretages følgende ændringer:

1) § 2 affattes således:

   "**§ 2.** Afgiftspligten efter denne lov omfatter:

   1) Formue, som er indestående på konti i færøske pengeinstitutter og postgiro, pensionsordninger i færøske pengeinstitutter efter §§ 1C og 1D i renteforsikringsloven, livsforsikringer og pensionsopsparinger i færøskt forsikringsselskab efter §§ 1, 1A og 1B i renteforsikringsloven.
2) Formueafkast af formue, som er indestående på konti i udenlandske pengeinstitutter, derunder også formueafkast af pensionsopsparingereftir §§ 1C og 1D i renteforsikringsloven.
3) Værdipapirer, jfr. § 1 i Virðisbrævaskattalógini.

   Undtaget er dog:

   a) aktier og andelsbeviser i selskaber indregistrerede på Færøerne jfr. § 1 nr. 8 i skatteloven,
   b) færøske obligationer,
   c) pantebreve og andre gælds-

við føstum rakstrarstaði í Føroyum."

2) § 3, stk. 1, pkt. 1 verður orðað soleiðis:
"Avgjaldsskyldan á ogn fevnd av § 2, nr. 1) liggur á øllum kontohavarum og tryggingartakarum, ið undantikið:"

3) § 3, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"persónar, sum ikki koma undir skattskyldu eftir § 1, nr. 1 í skattalógini"

4) Í § 3 verður nr. 2 orðað soleiðis:
"útlendsk felløg og útlendskir felagsskapir v.m., ið ikki koma undir skattskyldu eftir skattalógini."

5) Í § 3 verður sum nr. 13 sett:
"Peningastovnar við føstum rakstrarstaði í Føroyum, Tryggingarsambandið Føroyar, allar deildir tess og Føroya Lívstrygging."

6) Í § 4, stk. 2 verður strikað orðingin:
"f ø r o y s k i r s p a r i k a s s a r, Tryggingarsambandið Føroyar og allar deildir tess, Føroya Lívstrygging"

7) Í § 5 verður sum stk. 6 sett:
"**Stk. 6.** Í førum, har konto er vorðin uppgjørd í tí tíðarskeiði, lógin fevnir um, men har peningastovnur ikki hevur kraft avgjaldið, útskrivar og krevur Toll- og Skattstova Føroya vegna landskassan avgjaldið eftir hesi lóg. Gjaldsfreistin fyri tílík krøv verður sett til 1. í mánaðinum eftir, at kravið er útskrivað. Um kravið ikki verður goldið rættstundis, verða rentuásetingarnar í stk. 5 at galda fyri hesi krøv. "

8) Eftir § 5 verður sum § 5A sett:
"**§ 5 A.** Fyri tær í § 2, nr. 1 nevndu lívstryggingar og eftirlønarskipanir í tryggingarfelløgum fevnir avgjaldsgrundarlagið um tað til eina og hvørja tíð uppsparda virðið íroknað tillutað bonus.

breve, der udskrives i forbindelse med kundelån fra financieringsinstitutter med f a s t d r i f t s s t e d på Færøerne."

2) § 3, stk. 1, pkt. 1 affattes således:
"Afgiftspligten på formue omfattet af § 2, nr. 1) påhviler alle kontohavere og forsikringstagere med undtagelse af:"

3) § 3, nr. 1 affattes således:
"personer, som ikke har skattepligt i henhold til § 1, nr. 1 i skatteloven."

4) I § 3 affattes nr. 2 således:
"udenlandske selskaber og udenlandske foreninger m.v., som ikke er skattepligtige efter skatteloven."

5) I § 3 indsættes som nr. 13:
"Pengeinstitutter med fast driftssted på Færøerne, Tryggingarsambandið Føroyar, alle dets afdelinger og Føroya Lívstrygging"

6) I § 4, stk. 2 udgår ordene "de færøske sparekasser, Tryggingarsambandið Føroyar og alle dets afdelinger, Føroya Lívstrygging"

7) I § 5 indsættes som stk. 6:
"**Stk. 6.** I tilfælde hvor konto er opgjort i den periode loven omfatter, og hvor pengeinstitutter ikke har afkrævet afgift, udskriver og opkræver Toll- og Skattstova Føroya på vegne af landskassen afgiften i henhold til denne lov. Betalingsfristen sættes til 1. i måneden efter at kravet er udskrevet. Betales afgiften ikke rettidigt, er renterenteglerne i stk. 5 gældende for disse krav."

8) Efter § 5 indsættes som § 5A:
"**§ 5 A.** For de i § 2, nr. 1 nævnte livsforsikringer og pensionsopsparinger i forsikringsselskaber omfatter afgiftsgrundlaget det til enhver tid opsparede værdi inclusivt godskrevet bonus.
Stk. 2. Afgiften påhviler forsikrings-

Stk. 2. Tryggingartakararnir bera avgjaldið, men verður tað av avvarðandi tryggingarfelag tryggingartakarans vegna rindað beinleiðis í landskassan burturav tí árliga góðskrivaða ognarvinningintum á viðkomandi tryggingaravtala fyri tað viðkomandi tíðarskeiðið.

Stk. 3. Avgjaldið, ið tryggingarfelag krevur eftir hesum reglum, skal avroknast til landskassan eftir reglunum í § 5, stk. 4 og 5."

9) Í § 6, stk. 2 og í § 7, stk. 4 verða "15. februar" og "1. februar" broytt til: "15. marts"

10) § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Avgjaldsgrundarlagið fyri tey í § 2, nr. 3 nevndu virðisbrøv fevnir um virðið á øllum avgjaldsskyldugum virðisbrøvum sambært § 2 nr. 3"

11) Eftir § 7 verður sum § 7A sett: "
"**§ 7 A.** Um avgjaldsskyldugur ikki letur inn uppgerð, so sum fyriskrivað er í §§ 6 og 7, er Toll- og Skattstovu Føroya heimilað at skriva út rokning grundað á meting av avgjaldsgrundarlagnum. Landsstýrið kann við kunngerð fyriskriva neyvari reglur fyri meting eftir hesum reglum."

12) § 8 verður orðað soleiðis:
"**§ 8.** Fíggjarognaravgjaldið fyri ogn sambært § 2, nr. 1 er 0,6 % p.a. roknað av teim peninganøgdum sum bera eina og hvørja tilskrivaða bruttorentu ella annan ognarvinning, tó hægst 7/8 av netto ognarvinninginum. Nettoognarvinningur merkir her tilskrivaður bruttoognarvinningur, lækkaður við galdandi rentuskattaprosenti sambært rentuskattalógina.

Stk. 2. Av eftirlønarskipanum og lívstryggingum sambært § 2, nr. 1 verður fíggjarognaravgjaldið avmarkað til 7/8 av ávikavíst rentutilskrivtagerne, men betales af forsikringsselskabet på forsikringshavernes vegne til landskassen af det årligt godskrevne formueafkast på pågældende forsikringaftale for vedkommende periode.

Stk. 3. Afgiften som forsikringsselskabet opkræver efter disse regler, skal afregnes til landskassen efter reglerne i § 5 stk. 4 og 5."

9) I § 6, stk. 2 og i § 7, stk. 4 ændres "15. februar" og "1. februar" til: "15.mars"

10) § 7, stk. 1 affattes således:
"Afgiftsgrundlaget for de i § 2, nr. 3 nævnte værdipapirer omfatter værdien af alle de i henhold til § 2 nr. 3 afgiftspligtige værdipapirer."

11) Efter § 7 indsættes som § 7A:
"**§ 7 A.** Såfremt afgiftspligtig ikke indsender opgørelse som foreskrevet i §§ 6 og 7 er Toll- og Skattstova Føroya bemyndiget til at udstede regning på grundlag af skønsmæssigt ansat afgiftsgrundlag. Landsstyret kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for skønsmæssige ansættelser efter disse regler."

12) § 8 affattes således:
"**§ 8.** Afgiften på formue i henhold til § 2, nr. 1 er 0,6% p.a. beregnet af de kapitalbeløb, der danner basis for en og hver bruttorentetilskrivining eller andet formueafkast, dog højst 7/8 af det tilskrevne nettoafkast. Nettoafkastet er her bruttoformueafkastet reduseret med gældende renteskatteprocent i henhold til renteskatteloven.

Stk. 2. Af livsforsikringer og pensionsopsparinger efter § 2 nr. 1 begrænses afgiften til henholdsvis 7/8 af rentetilskrivningen i pengeinstitutter og bonustilskrivningen i forsikringsselskaber.

13) I § 9 ændres "25 %" til "15 %".

ingini í peningastovnum og bonustilskrivingini í tryggingarfelag."

13) Í § 9 verða "25 %" broytt til: "15 %"

14) Í § 10 verða "1,9%" broytt til: "0,6 %"

15) í § 10 verður sum stk. 2 sett:
"**Stk. 2.** Fíggjarognaravgjald samb. § 2, nr. 3 verður ikki kravt av premiulánsbrøvum hjá privatpersónum, um samlaða árliga áljóðandi virðið er 2.500 kr. ella minni."

16) Í § 13 verður sum ískoyti sett:
"og kann áseta reglur, sum skulu tryggja, at ogn ella inntøkur ikki kunnu flytast frá tíðarskeiðinum, hendan lóg er galdandi fyri."

17) § 18, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 2.** Fíggjarognaravgjaldið eftir § 8 verður galdandi fyri ogn fevnd av § 2 nr. 1), ið er útrokningargrundarlag fyri rentutilskrivingar frá og við 19. oktober 1993 og fyri annan ognarvinning frá og við 1. januar 1995."

18) Í § 18, stk. 3 verða strikað orðini "og til og við 31. desember 1994."

19) § 18 stk. 4 verður orðað soleiðis:
"**Stk.4.** Fíggjarognaravgjaldsskyldan eftir § 10 fyri virðisbrøv fevnd av § 2, nr. 3 verður í 1993 galdandi við 0,95% í mun til virðið á virðisbrøvunum pr. 31.12.1993 ella við søla og keyp aftan á 19. oktober 1993 við 0,95% smbr. § 10, pkt. 2-4. Fyri seinni ár verður galdandi avgjaldsprocent í § 10 gjørt galdandi í mun til virðisbrævavirðið við árskiftið. Viðv. keypi ella søla í árini smbr. § 10, pkt. 2-4."

20) í § 18 verður sum stk. 6 sett:
"**Stk. 6.** Rentuágóði og annar ognarvinningur av avgjaldsskyldugari ogn eftir § 2 verða fevnd av avgjaldsskyldini eftir hesi lóg, uttan mun til

14) I § 10 ændres "1,9%" til: "0,6 %".

15) I § 10 indsættes som stk. 2:
"**Stk. 2.** Afgift af financielle aktiver i henhold til § 2, nr. 3 opkræves ikke af privatpersoners præmieobligationer, såfremt samlede årlige pålydende værdi er 2.500 kr. eller mindre.

16) I § 13 tilføjes:
"og kan fastsætte regler, som skal sikre, at der ikke kan overføres formue eller indkomst fra det tidrum, som denne lov er gældende for."

17) § 18, stk. 2 affattes således: "
"**Stk. 2.** Afgiften på financielle aktiver efter § 8 har virkning for formue omfattet af § 2 nr. 1) som er udregningsgrundlaget for rentetilskrivning fra og med 19. oktober 1993 og for andet formuealkast fra og med 1. januar 1995."

18) I § 18, stk. 3 udgår ordene "og til og med 31. desember 1994."

19) § 18, stk. 4 affattes således:
"**Stk. 4.** For værdipapirer omfattet af § 2 nr. 3 indtræder afgiftspligten efter § 10 med 0,95% i 1993 i forhold til værdien på værdipapiret pr. 31.12.1993 eller ved køb og salg efter 19. oktober 1993 med 0,95% jvf. § 10 pkt. 2-4. For senere år gøres afgiftsprocenten i § 10 gældende i forhold til værdipapirsværdien ved årsskiftet. Vedrørende køb og salg i året jfr. § 10 pkt. 2-4."

20) I § 18 indsættes som stk. 6:
"**Stk. 6.** Rentegodskrivninger og andet formuealkast af formue omfattet af § 2 er omfattet af afgiftspligten i henhold til denne lov, uanset udbetalingstidspunktet."

nær ognin verður goldin."

§ 2

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Tó koma broytingarnar nr. 1), 2), 5), 6), 8), 12), 13), 14), og 19) í gildi 1. januar 1995.

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Stk. 2. Ændringerne nr. 1), 2), 5), 6), 8), 12), 13), 14), og 19) træder dog i kraft 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins er uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 192 frá 10. desember 1993 um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald.

Lógin, sum varð framløgd í Løgtinginum 19. oktober 1992 sum uppskot um meirinntøku til landskassan, varð mett at geva umleið 200 mió. kr. fyri 3 hálvár. Henda meting hevur víst seg at hava hildið, og hevur lógin tí virkað eftir ætlan.

Í tíðarskeiðinum lógin hevur verið galdandi, hevur tó víst seg tørvur á at broyta nakrar ásetingar í lógini, deils so lógin gerst lættari at umsita, men eisini fyri at bøta um viðurskifti, har árinið av lógini í dag ikki tykist so heppið.

Lógin var upprunaliga bert ætlað at virka sum fyribilslóg, og skuldi sostatt bert hava gildi í parti av 1993 og í 1994. Í samband við fyrireikingarnar av fíggjarlógini fyri 1995 hevur tað tó víst seg, at tørvur er á at lata verandi lóg halda áfram, tó í nakað broyttum líki, so landskassin m.a. við hesum lógaruppskoti lann tryggja sær tann inntøkutørv í fíggjarlógaruppskotið fyri 1995 setur.

Í hesum uppskoti verður m.a. skotið upp at frítaka peningastovnar og tryggingarfeløg fyri avgjald, og kemur hetta sjálvsagt at kosta landskassanum eina inntøkumiss í mun til galdandi reglur, eins og lækkingin av avgjaldinum førir við sær minni inntøku. Í hesum viðfangi skal tó verða víst til uppskotið um at hækka rentuskattin úr 22% í 35%, og sum í løtuni er til viðgerðar í Løgtinginum.

Annars eru broytingarnar, sum við hesum uppskoti verða lagdar fram, flestar meir av lógartekniskum slag, og hava ikki árin á inntøkutølini hjá landskassanum.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

1) § 2 verður í hesi broyting orðað av nýggjum og eisini broytt innihaldsliga. Høvuðsbroytingin eru nýggju ásetingarnar í § 2 nr. 1, har skotið verður upp, at avgjaldsmæssiga at javnseta eftirlønaruppsparing og aðrar uppsparingar í føroyskum tryggingarfelag við tær avgjaldsreglur, sum longu eru í gildi fyri

eftirlønaruppsparingarnar í føroyskum peningastovnum. Eftir hesum reglum kemur sostatt fíggjarognaravgjald at verða lagt á uppsparda virðið á eftirlønarskipanum og lívstryggingum í føroysku tryggingini.

§ 2 nr. 3 verður broytt, soleiðis at føroysk lánsbrøv fáa eina serstøðu eins og partabrøv, og lutaprógv í føroyskum feløgum við at tey verða frítikin fyri avgjald eftir hesi lóg.

Viðv. § 2 nr. 3 sum viðvíkur avmarkingini av hvørji virðisbrøv eru fevnd av lógini og hvørji ikki eru tað, var undir viðgerðini av lógaruppskotinum og í umsitingini gingið út frá, at tey pantibrøv og skuldarbrøv, ið eru undantikin vóru vanlig pantibrøv og skuldarbrøv fíggingarstovnanna og er greinin eisini vorðin umsitin á hendan hátt. Neyðugt hevur tó vístseg, at fáa umorðað galdandi regiur so at ásetingin gerst skilligari. Eftir uppskotinum skuldi hereftir verið greitt, at pantibrøv og skuldarbrøv sum eru liður í vanliga fíggingarvirksemi hjá avvarðandi fíggingarstovni ikki eru undir avgjaldsskyldu, meðan onnur virðisbrøv hjá stovninum so sum partabrøv og lánsbrøv/obligatiónir eru undir avgjaldsskyldu.

Í hesum sambandi er tó eisini vert at vísa, at sambært broyting nr. 5 gerast føroyskir peningastovnar og føroysk tryggingarfeløg avgjaldsfrí. Hendan frítøkan er tí bert relevant í mun til aðrar fíggingarstovnar, ið eru undir avgjaldsskyldu.

Sum fylgitolking fyri hvat skiljast skal sum virðisbrævi er gjørd ávísing til galdandi virðisbrævaskattalóg.

2) Broyting nr. 2 er bert fylgibroyting av nr. 1).

3) § 3 nr. 1, viðvíkur avgreinsanini fyri hvørjir persónar eru undir avgjaldsskyldu og hvørjir eru frítiknir. Neyðuga útgreinanin kemst av, at sum meginregla er ein og hvør, sum hevur innistandandi í Føroyum, tað verði seg sum innistandandi í føroyskum peningastovni, posigiro ella sum eftirlønarskipan ella lívstrygging í Føroyum, undir avgjaldsskyldu. Men landsstýrið metir rættast vera, at avgjaldsskyldan verður avgreinsað til at fevna um teir skattgjaldarar, sum eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, og eru búsitandi her. Viðmerkjast skal, at tá tað í hesum viðurskiftum verður tosað um bústað, eru tað skattligi týdningurin av bústaði, so sum hesin er í mun til reglurnar í § 1 nr. 1 í skattalógini, sum er galdandi.

   Broytingin førir ikki við sær broyting í mun til verandi støðu um, hvør er undir avgjaldsskyldu, men er ein umorðing so reglan gerst meir eintýðug.

4) Í § 3, nr. 2 er ásett, at útlendsk feløg ikki koma undir avgjaldsskyldu. Eisini eru nevndir aðrir felagsskapir, ið ikki koma undir skattskyldu, og er her tá sipað til útlendskar felagsskapir. Ásetingin verður við broytingini meir greið, so at skilligt er, at talan bert er um frítøku fyri útlendskar felagsskapir. Hetta kemst av, at mong feløg, sum eru undir skattskyldu eftir § 1, nr. 14 í skattalógini, hava skilt

hesa áseting, sum um tey eru frítikin fyri avgjaldsskyldu, í og við at tey eftir skattalógini bert eru skattskyldug av ávísum inntøkum, t.v.s. inntøkum av vinnuvirksemi. Hetta er tó ikki so. Hesi feløg eru fyri tað fyrsta ikki útlendsk feløg, og fyri tað næsta eru tey øll undir skattskyldu eftir § 1, nr. 14, hvørt vanliga skattskyldan er skerd til ávísa inntøku.

Við at undirstrika, at frítøkan bert er galdandi fyri útlendsk feløg v.m., skuldu allir misskiljingarmøguleikar verið beindir av vegnum.

5) Broyting nr. 5 er uppskot um at frítaka føroyskar peningastovnar og tryggingarfeløg fyri avgjaldsskyldu eftir hesi lóg, so avgjald ikki verður kravt av plasetingum teirra, hvørki í útlandinum ella her, tað verið seg sum innskot í peningastovn ella í virðisbrøv.

6) Her verða dagførdar tær ásetingar, sum eru neyðugar, fyri at fáa gjøgnumført frítøkuna, sum ásett er í § 3, nr. 13.

7) Í hesi broyting er orðað ein heimild hjá Toll- og Skattstovuni til at krevja inn møgulig avgjøld, ið eitt nú peningastovnar av ymiskum grundum ikki hava fingið kravt inn saman við rentutilskrivingini. Í slíkum førum verður rokning útskrivað frá Toll- og Skattstovuni til viðkomandi avgjaldsskylduga.

8) Í samband við at tryggingartakarar nú beinleiðis gerast avgjaldsskyldugir av uppspardu ogn teirra í eftirlønarskipanum og lívstryggingum, er her skotið upp, at avgjaldið eftir hesi lóg verður kravt av tí peninganøgd, ið má metast at svara til saldo á eini eftirlønarskipan, um hendan var í einum peningastovni. Avgjaldsgrundarlagið, ið sjálvt avgjaldskravið verður útroknað eftir, verður tí her skotið upp at vera tað í tryggingini uppsparda virðið íroknað bonus. Eins og í førunum tá talan er um peningastovnsviðurskifti, gerst skipanin mest einføld at umsita, við at tryggingarfelagið fær álagt uppkrevjingarskylduna.

Tryggingarfelagið skal hereftir eftirhalda avgjaldskravið í tí annars útroknaða bonuságóðanum á tí einkultu skipanini. Avroknast skal til landskassan á sama hátt, sum galdandi fyri peningastovnar, t.v.s. 15. í mánaðinum aftaná tilskriving er farin fram og eftirhaldið er vegna landskassans avgjaldskrav.

9) Her verður skotið upp at flyta innsendingardagin fyri tey avgjaldsskyldugu, ið hava innistandandi í útlandinum ella hava ogn í virðisbrøvum, ið skal rindast avgjald av, til at vera 15. mars, so innsendingin í flestu førum kann gerast saman við innlatan av sjálvuppgávuni.

10) Her er bert talan um umorðing av verandi áseting, og hevur hetta ikki nakra innihaldsliga broyting við sær.

11) Toll- og Skattstovan fær sum neyðugt amboð í arbeiði sínum heimild at gera meting av avgjaldsgrundarlagi hjá einum avgjaldsskyldugum, ið viðkomandi ikki

sum fyriskrivað letur inn uppgerð. Landsstýrinum verður heimilað at fyriskriva neyvari reglur fyri metanini, tá slík viðurskifti vanliga krevja neyvar reglur at fara eftir, so vissa kann vera fyri, hvussu tílíkar metingar fara fram og fyri at skapa lívaviðgeð fyri allar metingar av hesum slag.

12) Í mun til galdandi reglur verður avgjaldssatsurin lækkaður úr 1,9% í 0,6% p.a.

13) Galdandi 25% avgjaldssatsur á ognarvinningi úr útlandinum verður her lækkaður til 15%. Her skal viðmerkjast, at tá tey 15% verða roknað, verða tey roknað av útlendska bruttoognarvinninginum, og at tað tískil í hesum viðurskiftum ikki verður lækkað í avgjaldsgrundarlagnum fyri møgulig útlendsk avgjald ella skattir av somu inntøku.

14) Eins og ásett er fyri fíggjarognaravgjald av innistandandi ogn í Føroyum, verður avgjald ikki kravt, um áljóðandi virði fyri ognirnar av hesum slagi, um tær tilsamans eru undir 2.500 kr.

16) Her verður heimildin í verandi § 13 umorðað, so greitt er, at tær reglur, sum kunnu nágreinast í kunngerð um fyrisitingina av lógini, eisini kunnu innihalda tær neyðugu ásetingarnar fyri at tryggja, at tann inntøka og ogn, ið hoyrir til tíðarskeiðið, lógin er galdandi fyri, veruliga koma til skattingar, so sum ætlað.

17) - 20)

Gildisreglurnar verða broyttar sum fylgja av avgerð landsstýrisins um framhaldandi at hava hesa lóg í gildi. Sum er, skuldi lógin farið úr gildi um ársskiftið, men við hesum broytingum verður lógin verandi í gildi uttan tíðaravmarking.

Fyri at undirstrika týdningin av, at tær inntøkur og ognir, sum tilhoyra viðkomandi tíðarskeiðinum, ið lógin er galdandi fyri, eisini koma til skattingar, er sum stk. 6 skotin upp áseting um, at avgerandi fyri, um avgjaldið kann krevjast eftir reglunum í hesi lóg, ikki er útgjaldingarpunktið, men innvinningartíðspunktið, t.v.s. tað tíðarskeið, ið ogn og møguligur ognarvinningur viðvíkur.

1. viðgerð 5. desember 1994. Málið var beint í skattanevndina, sum 21. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. december 1994 og eftir 1. viðgerð 5. december 1994 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur undir viðgerðini havt fundir við umhoð fyri Toll- og Skattstovuna. Á hesum fundum eru m.a. viðurskiftini viðvíkjandi lánsbrævaskattinginí og fríløkan fyri peningastovnar og tryggingarfeløg umrødd.

Skattanevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Karl Robert Johansen, Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men hevur hesar viðmerkingar:

Meiri verður, at tann frítøka, ið landsstýrið setir fram sum broyting í § 3 viðvíkjandi avgjaldsskylduni hjá peningastovnum og tryggingarstovnum eisini eigur at vera galdandi fyri plaseringar hjá somu stovnum í útlandinum. Meirilutin mælir tí til, at § 4 verður broytt, so at avgjaldsfrítøkan eisini verður galdandi fyri ognir hjá nevndu stovnum, ið eru uttanlands.

Samstundis sum § 4 verður broytt sum omanfyri, verður greinin eisini umorðað, so tað gerst meir skilligt, at avgerandi fyri avgjaldsskylduna eftir § 4 er, um persónar og felløg eru fevnd av § 1 í skattalógini og hava skattligan heimstað í Føroyum samsvarandi skattatulkanina í hesum viðfangi, og at tað ikki er avgerandi fyri avgjaldsskylduna, um viðkomandi persónur ella felag í roynd og veru hevur nakra inntøku, sum eftir skattareglunum annars kemur undir skatting.

Henda præsisering skuldi sostatt gjørt greiðari, at eitt nú felløg og felagsskapir, nevndir í § 1, nr. 14, í skattalógini koma undir avgjaldsskyldu eftir lógini um rentu- og fíggjarognaravgjald, um tey eiga ogn ella móttaka ognaravkast, ið kemur undir hesa lóg, og at avgjaldsskyldan tí ikki er tengd at, um tey annars hava inntøku, sum førir til skatting eftir skattalógini.

Viðvíkjandi uppskotinum um at frítaka føroysk lánsbrøv fyri avgjald eftir hesi lóg, metir nevndin tað ikki vera rætt at frítaka nevndu lánsbrøv fyri avgjald, tí hetta førir við sær eina kappingaravlaðing í mun til innistandandi í føroyskum peningastovnum. Í samband við, at føroysku lánsbrøvini vórðu boðin fram, var nógvur dentur lagdur á, at skatta- og avgjaldsviðgerðin av hesum lánsbrøvum ikki skuldi virka kappingaravlaðandi í mun til peningasstovnsinnistandandi í Føroyum. Sum kunnugt hevur løgtingið samtykt at seta 35% rentuskatt á rentuna av hesum lánsbrøvum, eins og møguligur kursvinningur eisini verður skattaður. Skattanevndin fer tí at skjóta upp, at avgjaldsfrítøkan, ið landsstýrið hevur skotið upp, bert verður galdandi í 1994, so teir stovnar, ið meir ella minni frammanundan tí fyrru lánsbrævasøluni høvdu fingið lyfti um frítøku fyri avgjald á lánsbrøvum, ið keypt vóru í 1993 í samband við avtaluna millum landsstýrið og donsku stjórnina frá 1. februar 1993, fáa avgjaldsfrítøku fyri hesi lánsbrøv fyri 1994, men annars ikki framyvir frá 1. januar 1995 at rokna. Til at røkka hesum endamáli skjýtur nevndin tí upp at broyta gildisreglurnar í lógaruppskotinum.

Grundað á omanfyri standandi setir meirilutin fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1, nr. 3, verður skoytt uppí sum nýtt litra d:
"upphæddir, ið standa í Yvirformyndarfinum og Barnahjálpargrunninum."

2) I § 1 verður nr. 6 orðað soleiðis:
"§ 4 verður orðað soleiðis:
"Avgjaldsskyldan av ognarvinningi av ogn, fevnd af § 2, nr. 2, og avgjaldsskyldan fyri ogn, fevnd av § 2, nr. 3, liggur á øllum skattskyldugum, nevnd í § 1 í skattalógini, og sum hava skattligan heimstað í Føroyum. Undantikin frá avgjaldsskyldu eftir hesi grein eru tó teir í § 3, nr. 13, nevndu peningastovnar og tryggingarfeløg.
Stk. 2. Eisini hava Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, Færøernes Realkreditinstitut og Figgingargrunnurin fyri 1992 skyldu at rinda rentuavgjald av ognarvinningi av ogn teirra, fevnd av § 2, nr. 2, og ognaravgjald av ogn teirra, fevnd av § 2, nr. 3.""

3) § 2, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"Í broyting nr. 1 koma § 2, nr. 1 og 2, í gildi 1. januar 1995, meðan § 2, nr. 3, kemur í gildi dagin eftir, at lógin er kunngjørd, og er galdandi fyrstu ferð fyri álmanakkaárið 1994. § 2, nr. 3, litra b, fer úr gildi 1. januar 1995 og verður § 2, nr. 3, litra c og d hereftir § 2, nr. 3, litra b og c."

4) Í § 2 verður sum stk. 3 sett:
"Broytingarnar nr. 2, 5, 6, 8, 12, 13, 14 og 19 koma í gildi 1. januar 1995."

1) I § 1, nr. 3, tilføjes som nyt litra d:
"beløb, indestående i Overformynderiet og
"Barnahjálpargrunnurin"."

2) I § 1 affattes nr. 6 således:
"§ 4 affattes således:
"Afgiftspligten for formueafkast af formue, omfattet af § 2, nr. 2, og formue, omfattet af § 2, nr. 3, påhviler alle skattepligtige, nævnt i § 1 i skatteloven, og som har skattemæssigt hjemsted på Færøerne. Undtaget fra afgiftspligten i henhold til denne bestemmelse er dog de i § 3, nr. 13, nævnte pengeinstitutter og forsikringsselskaber.
Stk. 2. Endvidere påhviler det Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, Færøernes Realkreditinstitut og Finansieringsfonden af 1992 pligt til at betale renteafgift af formueafkastet af deres formuer, omfattet af § 2, nr. 2, og formueafgift af deres formue, omfattet af § 2, nr. 3.""

3) § 2, stk. 2 affattes således:
"I ændring nr. 1 træder § 2, nr. 1 og nr. 2 i kraft 1. januar 1995, medens § 2, nr. 3, træder i kraft dagen efter lovens bekendtgørelse og har virkning første gang for kalenderåret 1994. § 2, nr. 3, litra b, sættes ud af kraft 1. januar 1995, og derefter bliver § 2, nr. 3, litra c og d til litra b og c."

4) I § 2 sættes som stk. 3:
"Ændringerne nr. 2, 5, 6, 8, 12, 13, 14 og 19 træder i kraft 1. januar 1995."

Finnbogi Ísakson tekur undir við meirilutanum, men hevur hesar viðmerkingar:

Lógin um figgjarognaravgjald kom í gildi 10. december 1993 og skuldi bert galda til 31. december 1994.

Í samgonguskjalinum hjá núverandi samgongu stendur, at lógin um fíggjarognaravgjald skal setast úr gildi. Kortini skjýtur landsstýrið nú upp at krevja 0,6% í fíggjarognaravgjaldi í 1995, og er hetta sostatt ein nýggjur skattur.

Skattanevndin skjýtur upp, at tvey undantøk verða gjørd: Barnahjálpargrunnurin nýtir sína rentuinntøku at býta út til trongstødd børn, og skotið verður tí upp, at grunnurin skal ikki verða kravdur eftir fíggjarognaravgjaldi.

Yviformyndarfíð hevur ræði á peningi, sum faðir- ella móðurleys børn eiga. Eftirlivandi faðir ella móðir kann tó ráða yvir rentuinntøkunum. Skotið verður tí upp, at slíkur peningur, sum yvirformyndarfíð ræður yvir, ikki verður kravdur eftir fíggjarognaravgjaldi.

Bæði Barnahjálpargrunnurin og peningur, umsitin av yvirformyndarfinum, eru frammanundan frítiknir fyri rentuskatt.

Minnilutin fegnast um hesar broytingar og tekur annars við hesum viðmerkingum undir við uppskotinum og teimum broytingum, sum skattanevndin mælir til.

Ein annar minniluti (Jørgen Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:
Tá fíggjarognaravgjaldið kom í gildi, var frá táverandi samgongu lovað uppspararum, at hetta var ein lóg, ið var í gildi í 1,5 ár. Nú lógin skal fara úr gildi, ætla júst somu flokkar saman við sambandsflokkinum at lata lógina halda fram og harafrat í óavmarkaða tíð. Hetta tykist sera órimiligt.

Hagtøl frá bankunum vísa, at fólk seinastu árini hava tikið peningin út. Vandi er nú fyri, at tey, sum enn hava peningin standandi, tí tey trúðu landsstýrinum, eisini taka peningin út.

Fíggjarognaravgjaldið er fyrsta stigið á leiðini fram til ognarskatt, sum ongantíð áður hevur átt politiskan meiriluta aftanfyri seg á Føroya løgtingi. Prinsippið um ikki at ognarskatta er fyri fyrstu ferð brotið, og helst endar tað sum við rentuskattinum, ið hækkaði sera skjótt, hóast ætlanin í fyrsta umfari bert var at kvinka hann eitt sindur upp eftir.

Við fíggjarognaravgjaldinum er lagt avgjald á øll sløg av peningakonti hjá borgarunum, eisini hjá borgarum, ið skylda meira burtur, enn teir eiga. Av somu orsøk ber til at siga, at fíggjarognargjaldið í royndog veru rakar harðari enn reinur ognarskattur. Hóast tú onga nettoogn eigur, tá skuldin er mótroknað, skalt tú kortini gjalda skatt, sum um talan var um veruliga ogn.

Eisini skal uppsparda ogn fólksins í eftirlønarskipanum og lívstryggingum fíggjarognarskattast. Fólk hava trúliga sett til viks hvønn mánaða til aldurdómin aftan á, at tey hava fingið politisk lyfti um, at tryggingarskipanirnar ikki fóru at verða rørdar, men hvat?

Undanførslan við hesum uppskoti er tann sama sum við so nógvum øðrum inntøku-

lógum, nevniliga at fáa meira pening til fíggjarlógina. Sitandi samgonga ger sama mistak sum undanfarna samgonga, nevniliga starir seg blindan í meirinntøkum og gloymir sparingar. Fíggjarlógaruppskotið fyri 1995 vísir, at rakstrarútreiðslurnar verða hægri enn fyri 1994, meðan fløgur og viðlíkahald minka nakað, tó ikki í nær námind av hækkingini av rakstrinum.

So hvørt skattir og avgjøld eru hækkað, er samfelagið vorðið meir og meir avskeplað, og tí má henda gongd steðgast, og javnvág má fáast millum tann vinnuliga og almenna sektorin í samfelagnum.

Minnilutin mælir frá at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Málið afturtikið.

34 Broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn

Ár, 1994, fríggjadagin 9. desember legði landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 69 frá 10. mai 1994 um ábyrgdargrunn verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4, stk. 4, 2. punktum verður strikað.
2) § 7 verður strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá sama degi, lógaruppskotið er sett fram.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om garantifond.

§ 1.

I lagtingslov nr. 69 af 10. maj 1994 om garantifond foretages følgende ændringer:

1) § 4, stk. 4, 2. punktum udgår.
2) § 7 udgår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft samme dag, lovforslaget fremsættes.

Viðmerkingar:

Lógin um ábyrgdargrunn er gjørd við donsku lógini nr. 1007 frá 19. desember 1992 við seinni broytingum sum fyrimynd. Endamálið við donsku lógini er at økja um lánsveitingina til nýggjar verkætlanir, nýggjar framleiðslur og nýggjar fyritøkur og á tann hátt at fremja stovnan av nýggjum arbeiðsplássum. Hetta endamál skal røkkast við at minka um tapsvandan hjá lánveitarum, og tí veitir tað almenna ábyrgd fyri afturgjalding av nýggjum lánum, ið peningastovnar veita virkjum og einstaklingum til nýggjar verkætlanir.

Í endamálsgreinini í føroysku lógini um ábyrgdargrunn verður sagt, at endamál grunsins er at stuðla nýggjum tiltøkum og nýggjum framleiðslum innan vinnulívið. Tó at endamálsgreinirnar eru orðaðar ymiskt, kann eingin ivi vera um, at ætlanin við føroysku lógini er tann sama sum við donsku lógini.

Longu áðrenn danska lógin frá 19. desember 1992 varð sett í gildi, varð hon broytt við lóg nr. 258 frá 6. mai 1993. Síðan eru aðrar broytingar hendar í donsku skipanini, ið ikki eru komnar í lógarformi, men sum vit kunnu taka við í einari endurskoðan av føroysku lógini. Herumframt er ein misskiljing komin í í núverandi § 7 í føroysku lógini.

Viðmerkingar til einstøku punktini:

Til 1): Í dansku lógini verður sagt: "Ved en ny aktivitet forstås en aktivitet, som virksomheden eller virksomhedens ejer ikke i forvejen driver eller tidligere har drevet". Í samsvarandi § 4, stk. 4, 2. punktum, í føroysku lógini verður sagt: "Nýggjar verkætlanir eru tiltøk og framleiðslur, sum virkið ella einstaklingurin ikki áður hevur fingist við". Eingin serligur munur er millum dansku og føroysku orðingina. Kortini hava dansku myndugleikarnir, ið umsita InitiativKaution, Vækstfonden, tikið hetta krav úr umsóknarblaði og vegleiðing fyri lánum við InitiativKaution (borgan frá ábyrgdargrunni). Nú verður einans kravt, at lán ikki verður veitt í sambandi við umlegging av lánum ella til yvirtøku av verandi virksemi ella pørtum av verandi virksemi. Tá hesi lán eru tikin úr, gerast møguleikarnir fyri misnýtslu av borgan frá ábyrgdargrunninum rættiliga smáir, og tá tað samstundis verður kravd ein frágreiðing um nýggju verkætlanina, ber til at sálda burturfrá restina av lánsveitingunum, ið ikki snúgva seg um nýtt virksemi. Spurningurin um lánsveiting annars eru viðurskifti millum lánveitara og lántakara. Lánveitarar eru hvørki hugaðir at missa 100% ella 50% av einum láni, og er talan um nýggja verkætlan sbrt. frammanfyri standandi, eigur tað almenna ikki at forða fyri, at nýtt virksemi, ið lánveitarin trýr uppá, fær møguleikar at taka seg upp. Einasta kravið er, at borgan ikki verður veitt fyri lánum, sum eru givin, áðrenn lógin kom í gildi, og at borgað ikki verður fyri umlegging av skuld ella til yvirtøku av verandi virksemi ella pørtum av verandi virksemi, sbrt. § 4, stk. 4, 3. punktum, ið hereftir verður 2. punktum.

Til 2): Eftir dansku lógini veitir danski staturin sjálvskuldaraborgan fyri lánum, ið eru veitt sbrt. lógini, og má sjálvur krevja inn tað, ið staturin hevur til góðar, um borganin verður effektiv. Hesin borganarháttur er smidligari fyri peningastovnarnar. Við einfaldari (simplari) borgan er neyðugt hjá peningastovninum fyrst at troyta allar veittar trygdir fyri láninum, áðrenn hann kann gera upp við landsstýrið, hvat tapið er í sambandi við borganina.

Føroysku peningastovnarnir meta einfalda borgan sum ein bága við skipanini, tí hon vil seinka munandi um útgjaldið til peningastovnin av effektivum veðhaldi.

Landsstýrið og Føroya løgting hava ta støðu, at tað almenna í Føroyum bert skal veita einfalda (simpla) borgan. Tí er hetta broytt í føroysku lógini, uttan at § 7 samstundis er strikað.

Tað er hetta, ið nú verður gjørt, og fyri ikki at seinka nýtslu av ábyrgdargrunninum meira enn longu er hent, er áset, at lógin skal hava gildi frá sama degi, lógaruppskotið er sett fram í tinginum.

1. viðgerð 14. desember 1994. Málið var beint í rættarnevndina, sum 17. februar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 9. desember 1994 og varð aftaná fyrstu viðgerð tann 14. desember 1994 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið. Í hesum sambandi hevur nevndin havt fund við Óla Jacobsen, landsstýrismann, ið umsitur málsøkið í landsstýrinum, og umboð fyri stýrið, ið umsitur grunnin.

Umboðið fyri stýrið hevur greitt nevndini frá, at tað er stýrið fyri ábyrgdargrunnin, ið hevur skotið upp at broyta lógina. Orsøkin til, at stýrið hevur skotið upp at broyta lógina er fyrst og fremst, at royndir úr Danmark vísa, at tað er sera trupult at gera av nær talan er um nýggjar verkætlanir. Tá ið so haraftrat kemur, at nýggjar verkætlanir ikki er virksemi, sum einstaklingur ella virki hevur fingist við áður, er tað so gott sum ógjørligt at fáa veðhald úr grunninum.

Endamálið við lógini var, at fáa peningastovnar at fíggja nýggjar verkætlanir. Avgerandi fyri um veðhald skal veitast má tí vera um peningastovnarnir meta verkætlanina vera so skilagóða, at teir vilja veita fígging. Um einstaklingurin ella virkið hevur fingist við virksemi áður eigur ikki at vera avgerandi fyri spurningin um landskassin skal veðhalda.

Eingin broyting verður gjørd í sambandi við, at lán verða umløgd ella at lán verða yvirtikin í sambandi við verandi virksemi. Her kann ábyrgdargrunnurin framhaldandi ikki veðhalda.

Umboðið fyri stýrið hevur greitt nevndini frá, at orsøkin til at skotið verður upp at strika § 7 í lógini, ið ásetur, at gjaldstovan kann innkrevja tað, ið landsstýrið hevur tilgóðar um borganin verður effektiv, við rentum, við at afturhalda løn o.a. hjá lántakaranum, sambært reglunum fyri innkrevjan av persónsskatti í samtíðarskattalógini er, at stýrið heldur tað verða skeivt, at gjaldstovan skal hava henda møguleika tá ið landsstýrið veitir einfalda borgan. Her má peningastovnurin tryta allar møguleikar áðrenn hann kann fara til landskassan eftir veðhaldinum. Um landsstýrið veitti sjálvsskuldnaraborgan hevði støðan verið øðrvísi, tí tá kundi peningastovnurin farið til landskassan beinanvegin, tá ið skuldarin ikki hevði goldið skuldina.

Ein samd rættarnevnd heldur tað ikki vera rætt at broyta definitiónina uppá nýggjar verkætlanir í lógini. Talan er um eina serliga lóg, ið gevur teimum, ið nýta sítt hugflog og fara undir nýggjar verkaætlanir og tiltøk, møguleika fyri at fáa landsstýrið at veðhalda fyri hesum verkætlanum og tiltøkum.

Ein samd rættarnevnd tekur heldur ikki undir við at broyta regluna í lógini um, at taka heimildina at afturhalda í løn hjá lántakaranum, sambært reglunum um innkrevjan av persónskatti í samtíðarskattaskipanini, frá gjaldstovuni.

2. viðerð 9. mars 1995. Málið fall við 12-0 atkvøðum.

35 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m.

Ár 1994, týsdagin 22. november 1994 legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

<u>løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m.</u>

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 175 frá 18. december 1992 um skrásetingargjald á motorakførum v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 1 ganga út orðini: "og eitt vektgjald".
2) § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
   "MVG-/virðisgrundarlagið á motorakførum er søluprísur frá seljara í Føroyum til keypara, froknað at aktarið er útgjørt við atlari vanligari útgerð og cykaútgerð. Í mvg-/virðisgrundarlagið inngongur fakturaprísur, farmagjald, flutningstrygging, vørugjald, uppskipan og klárgerð, vinningur sambært § 1, skrásetingarsýn, tollur o.t. í Føroyum. Í skrásetingargjaldi verða goldin 30% av mvg-/virðisgrundarlagnum.
3) Í § 2, stk. 2, 4 og 5 verður "virðisgrundarlagið" broytt til "mvg-/virðisgrundarlagið".
4) § 2, stk. 3 gongur út. og stk. 4 og 5 verða stk. 3 og 4.
5) § 3 verður orðað soleiðis:
   "Persónvognar:
   Virðisgjald: 30%."
6) § 5 verður orðað soleiðis:
   "Vøruvognar av skapi og merki sum persónvognar:
   Virðisgjald: 10%."

<u>lagtingslov om ændring af registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.</u>

§ 1.

I lagtingslov nr. 175 af 18. december 1992 om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v. foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 1 ændres ordene "værdi- og en vægtafgift" til: "værdiafgift".
2) § 2, stk. 1 affattes således:
   "MVG-/Værdigrundlaget for motorkøretøjer er salgsprisen fra sælger på Færøerne til køber, iberegnet at køretøjet er forsynet med standardudstyr og ekstraudstyr. I mvg-/værdigrundlaget indgår fakturapris, fragtafgift, transportforsikring, vareafgift, losning og klargørelse, avance, registreringsafgift jfr. § 1, registreringsgebyr, told o.l. på Færøerne. Som registreringsgebyr erlægges 30% af mvg-/værdigrundlaget.
3) I § 2, stk. 2, 4 og 5 ændres "værdigrundlaget" til "mvg-/værdigrundlaget".
4) § 2, stk. 3 udgår, og stk. 4 og 5 bliver stk. 3 og 4.
5) § 3 affattes således:
   "Personmotorkøretøjer.
   Værdiafgift: 30%."
6) § 5 affattes således:
   "Varevogne af type og fabrikat som personvogne.
   Værdiafgift: 10%."

7) Í § 5 verður 2. stk. soljóðandi:
"Verður vøruvognur umskrásettur til persónvogn, skal munurin á virðisgjaldinum rindast landskassanum."

8) § 6 verður orðað soleiðis:
"Bussar til 10 persónar ella fleiri, førarin íroknaður:
Virðisgjald: Einki gjald
Vektgjald: Einki gjald."

9) § 8 verður orðað soleiðis:
"Last- og vøruvognar, dumparar og leguvognar, støðd eftiri totalvekt:
Virðisgjald 10%
Vektgjald: Einki gjald."

10) § 11 verður orðað soleiðis:
"Motorsúkklur.
Virðisgjald 30%
Vektgjald: Einki gjald."

11) § 12 verður orðað soleiðis:
"Campingvognar.
Virðisgjald 30%
Vektgjald: Einki gjald."

12) § 14 verður orðað soleiðis:
"Aðrir viðfestisvognar.
Virðisgjald: Einki gjald.
Vektgjald: Einki gjald."

13) § 18, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Skrásetingargjaldið kann tó ongatíð verða lægri enn 40% av virðisgjaldinum fyri sama akfar sum nýtt."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

7) Stk. 2 i § 5 affattes således:
"Såfremt en varevogn omregistreres til en personvogn, skal differencen betales til landskassen."

8) § 6 affattes således:
"Busser til 10 personer og derover, føreren ikke regnet:
Værdiafgift: Ingen afgift.
Vægtafgift: Ingen afgift."

9) § 8 affattes således:
"Last- og varevogne, dumpers og sættevogne, størrelse efter totalvægt:
Værdiafgift 10%.
Vægtafgift: Ingen afgift."

10) § 11 affattes således:
"Motorcykler.
Værdiafgift 30%.
Vægtafgift: Ingen afgift."

11) § 12 affattes således:
"Campingvogne.
Værdiafgift 30%
Vægtafgift: Ingen afgift."

12) § 14 affattes således:
"Andre påhængsvogne.
Værdiafgift: Ingen afgift.
Vægtafgift: Ingen afgift.

13) § 18, stk. 3 affattes således:
"Registreringsafgiften kan dog aldrig være lavere end 40% af værdiafgiften for tilsvarende køretøj som nyt."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Viðmerkingar:

Uppskotið er ein ávegis royndi at gera øll akfør bíligari, so
1. Meinigi føroyingurin fær betri ráð at skifta gamlan bil út.
2. Vinnuvirki fáa møguleika at útvega hóskandi arbeiðsakfar.
3. Nakrir av teim 100-tals handverkarum, sum hava mist sítt arbeiði, aftur sleppa í vinnu.
4. Landskassin kann fáa størri inntøkur frá hesi fyrr so tryggu inntøkukeldu.

Bilavinnan er nevniliga ein av teim mongu vinnugreinum, sum er køvd av almenna skatta- og tollláganginum farnu mongu árini til at nøkta almenna nýtslutørvin.

Verður uppskotið samtykt, lækkar søluprísurin á øllum akførum millum fjórðing og triðing av núverandi bilaprísum. Sostatt fellur ein nú "bíligur" bilur úr t.d. 130.000 kr. niður í 95.000 kr. Ein miðal dýrur bilur fellur úr t.d. 170.000 kr. niður í 125.000 kr. Ein í dag dýrur bilur fellur úr t.d. 300.000 kr. niður í góðar 200.000 kr. o.s.fr.

Sama verður galdandi fyri vøruvognar, lastbilar og motorsúklur, um løgtingið samtykkir lógaruppskotið. Øll akfør verða bíligari.

Men uppskotið hevur eisini við sær, at landskassans inntøka hækkar í sama mun, sum talið á innfluttum, seldum og umvældum bilum økist.

Uppskotna prislækkingin á øllum akførum, tað økta virksemið í bilavinnuni og tann hækkaða landskassainntøkan fáast við at gera biltollingina einfaldari og lagaligari. Sum er kostar ein bilur frá bilhandli í Føroyum millum 3 og 4 ferðir tann pris, sum verksmiðja selir bilin fyri. Eftir uppskotinum lækkar útsøluprísurin niður í gott tvær ferðir innkeypsprísin.

Bíligari arbeiðsbilar høvdu stimbrað okkara hart kroystu vinnufyritøkur almikið.

Ein lækking av bilaprísunum er bráðneyðug sum ein royndi at tálma vøksturin í arbeiðsloysinum og flytingina úr Føroyum. Fyri bert 3-4 árum síðan fingu 4-500 fólk, serliga handverkarar, sína úrtøku í bilavinnuni. Bilavinnan liggur á odda í mekaniskari tøknifrøði, og tí er av alstórum týdningi, at Føroyar ikki missa tann lívsneyðuga fyrimun, tað er hjá einum og hvørjum samfelag at hava eitt fjølment og væl útbúgvið lið av mekanikarum.

Kreppan í samfelagnum, sum fyrst og fremst stavar frá almennu eyðræningini av landsins íbúgvum og vinnulívi við skatti og tolli, hevur ført við sær, at eingin longur hevur ráð til at keypa bil, hvørki nýggjan ella brúktan. Tískil er talið á starvsfólki í bilavinnuni fallið úr 400-500 niður um 100, t.e. 80% síðan 1989.

Persónbilurin (ella "privatbilisman") er ein av nógvum stórsigrum demokratisku kapitalismunnar hesa farnu øldina í stríðnum móti hópfátækradømi mannaættarinnar. Bilurin var óuppnáiligt marglætii fyri meiniga mannin fyri bert fáum ættarliðum síðan. Men kapitalistiska menningin setti bilin í túnið hjá nærum hvørjum húski í okkara tíð.

Men frælsi hins einstaka til at ráða sær sjálvum í tíð og stað, til at flyta seg við egnum akfari eftir vild, til at bróta stavsband støðusamfelagsins, hetta frælsið, sum bilurin gav okkum øllum, hevur vissuliga møtt stórari politiskari mótstøðu. Ideologiskt snævurskygni trýsti kollektivan fólkaflutning inn á føroyska samfelagið í nógv størri mun, enn eftirspurningur var til. Sostatt hevur t.d. Bygdaleiðir farnu 10 árini kostað skattgjaldarunum 300 mió. kr. í rakstrarhalli - t.e. 25.000 kr. upp á húskið - umfram

kostnað av ferðaseðlum. (Ikki fyrrenn í 1992 byrjaði játtanin á fíggjarlógin í til hetta hall at minka.)

Eisini hava politikarar lagt toll oman á avgjald, cykaavgjald, vektgjald, virðisgjald, mvg o.s.fr. á sjálvan bilaprísin. Tískil fæst ein bilur, ið kostar t.d. 50.000 kr. frá verksmiðju, ikki fyri minni enn 170.000 kr. frá føroyskum bilahandli. Altso tekur hitt almenna sær yvir 100.000 kr. ella 2/3 av útsøluprísinum.

Í støðugari tráan eftir peningi til at nøkta ósløkkjandi tosta hins almenna eftir støðugt meir peningi hava politikarar pínt bilaprísirnar upp eftir í mong ár. Øvundin hevur verið brúkt til undanførslu, so teir dýru bilarnir dýrkaðu mest. So sluppu tey "ríku" at rinda mest fyri sítt bilaval. Úrslitið av hesum øvundarpolitikki er nú, at allir bilprísir hækkaðu upp hagar, at neyvan nakar, og tá als ikki fjøldin, hevur ráð til at keypa bil.

So leingi búskaparliga uppdriftin vardi, fingu fólk fígging til at keypa bil. Bilaparkin í Føroyum øktist soleðis:

1970	3.639
1975	7.430
1980	11.912
1985	15.730
1988	18.895
men í 1994	15.000 (uml.).

Sum sæst, toppaði bilatalið í 1988. Síðan er tað fallið meir enn 3.000 akfør. Stóru goymslurnar av brúktum bilum í bilahandlunum eru minkaðar burtur í einki. Sostatt eru fleiri túsund bilar færri í landinum í dag enn fyri 4 árum síðan.

Árliga talið á innfluttum bilum sýnir eisini stóran keypshug og -orku í 80-árunum. Sum dømi kunnu nevnast, at í

1980	vórðu	1.259	nýggj	akfør	skrásetu
1987	-	2.710	-	-	-
1990	-	531	-	-	-
1992	-	557	-	-	-
1993	-	133	-	-	-

Frá 1985-88 lá miðaltalið um 2.000 innluttar bilar árliga. Tað toppaði í 1987. Sostatt varð bilaparkin so gott sum útskift eftir fáum árum. Tann keypshugurin var í meira lagi. Men kollapsið í innflutninginum eftir 1990 er alt ov stór afturgongd. Tí bilaparkin er nú nógv eldri í miðal enn fyri 5 árum síðan. Tað merkir aftur, at trygdin fer at halta, so hvørt sum miðalaldurin á føroysku bilunum hækkar.

Handilstølini fyri innflutningin vísa, at bilarnir sum vøruhólkur kostaðu so nógv:

1985	125 mió. kr.
1986	189 - -
1987	212 - -

1988	156 - -
1989	103 - -
1990	33 - -
1991	35 - -
1992	37 - -
1993	9 - -

Lutvíst fyri at tálma bilainnflutninginum, lutvíst fyri at bremsa fólkaynskinum at koyra í góðum bili, men serliga fyri at vinna landskassanum meir pening í ósløkkjandi tostanum eftir størri almennari nýtslu, hækkaðu politikkarar ferð eftir ferð toll og alskyns avgjøld á bilum. Upplinnsemið í jagstranini eftir biltolli og -avgjøldum kendi einki mark. Lógin um tolling av motorakførum er ein frumskógur av krøvum um fløktar útrokningar. Hetta uppskot sum lóg hevði gjørt útrokningina einfaldari.

Stóri vøksturin í bilatalinum seinna part av 80-árunum gav gylt í landskassan. Landskassans inntøkutøl frá bilainnflutninginum vóru hesi:

Ár	Skrásett gjøld
1987	160 mió. kr.
1988	120 - -
1989	81 - -
1990	31 - -
1991	34 - -
1992	29 - -
1993	10 - -
1994	uml. 6 - -

Harumframt hevur vegskatturin givið hinum almenna um 30-35 mió. kr. árliga í nógv ár. Føroyar hava hægsta bensinprís í Europa, so eisini her hevur hitt almenna havt sína køvandi hond við í spælinum og fingið um 40 mió. kr. árliga í inntøku.

Í 1988, 89 og 90 væntaði landsstýrið sær ávikavist 40, 38 og 53 mió. kr. meiri í skrásetingargjaldi, enn tað veruliga eydnaðist at fáa, tí bilainnflutningurin fall so nógv. Hetta veruleikafjara bjartskygni sýnir best, at politikararnir væntaðu sær fleiri gullegg frá hesi "hønuni", eftir at teir høvdu kypt hana við tolli og avgjøldum.

Men sjálvt tann sannroynd, at eisini henda áður so vellandi keldan til almennar innløgur nú var tornað, hevur ikki enn fingið landsstýrið til at taka náttúrligu fylgjumar av hesi dáragerð at tolla bilhandilin til deyðis og at lækka toll- og avgjøldini.

Heldur ikki tann mista inntøkan í skatti og øðrum nýtslugjøldum frá teimum hundraðtals handverkarum í bilavinnuni, sum nú eru arbeiðsleysir ella arbeiða svart hevur fingið landsstýrið at lækka biltollin soleiðis, at vinnan kemur fyri seg aftur og verður grundarlag undir 100-tals arbeiðsplássum sum fyrr.

1.000 nýggir bilar seldir árliga høvdu við lækkaðum toll- og avgjøldum smbr. hesum

uppskoti givið landskassanum um 60 mió. kr. í inntøku. Orsakað av høpisleyst bøgum toll- o.ø. skrásetingargjøldum fær landskassin nú millum lítið og einki í inntøku frá hesum vørubólki, tí einki verður innflutt.

400 handverkarar, sveinar, lærlingar og sølufólk fingu helst 150.000 kr. í ársinntøku í miðal og høvdu goldið 40 mió. kr. í skatti og nýtslutolli. Í staðin rindar ALS 400 arbeiðsleysu bilafólkum 20 mió. kr. fyri einki at gera ella arbeiða svart. Havast má í huga, at bilavinnan var ein hin fremsta til at geva handliga hugaðum ungdómum møguleika fyri læruplássi. Hesi ungu ganga nú arbeiðsleys ella rýma av landinum.

Sostatt missir hitt almenna um 120 mió. kr. árliga, mest tí politikkarar ikki skilja týdningin av, at jú harðari ein vøra, tænasta ella arbeiði verða revsað við beinleiðis og óbeinleiðis skatti, jú minni fær hitt almenna í kassan. Allur búskapurin svíður fyri tað. Núverandi støða er høpisleys við so stórum avgjøldum á bilar, at bilassølan er steðgað, arbeiðsloysið millum bilmekanikarar og sølufólk er ógvusligt, og landskassin fær einki í inntøku.

Uppskotsstillarin mælir tinginum til at taka undir við hesum lógaruppskotinum um at gera øll akfør bíligari, at skapa fleiri arbeiðsspláss í handverksvinnuni, at linna kreppuna í búskapinum og at bøta støðuna í samfelagnum, harvið eisini í landskassanum.

Men um framsetta lógaruppskot ikki fær undirtøku, tí tað ger hiltollingina ov einfalda og tískil brýtur ovmikið frá verandi tollskipan, verður sett fram niðanfyri nevndu viðmerkingar saman við hesum

u p p s k o t i

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum við virkingini frá í seinasta lagi 1. januar 1995 at leggja lógaruppskot fyri tingið um lækking av bilprísunum við hesum broytingum til verandi skrásetingarlógir:

Virðirgrundarlag upp til kr. 50.000		25%
-	frá kr. 50.000 til kr. 70.000	kr. 12.500 av kr. 50.000 + 40% av restini
-	frá kr. 70.000 til kr. 90.000	kr. 20.500 av kr. 70.000 + 70% av restini
-	frá kr. 90.000 til kr.100.000	kr. 34.500 av kr. 90.000 + 100% av restini
-	omanfyri kr. 100.000	kr. 44.500 av kr. 100.000 + 120% av restini.

Viðmerkingar:

Í 1994 verða bert einir 100 bilar falt seldir í Føroyum. Uml. 11.000 persónbilar av falt uml. 15.000 eru yvir 7 ára gamlir og tí ótryggir. Landskassans inntøka frá skrásetingargjaldi fyri nýggjar bilar verður í ár bert eini 5-6 mió. kr.

Alt talar fyri, at í minsta lagi skrásetingargjaldið verður munandi lækka-, so bilaparkin verð endurnýggja, bilasølurnar fingu meiri umsetning, nøkur arbeiðspláss komu attur í hesi vinnu, og landskassin fekk nakrar 10 mió. kr. í inntøku í skrásetingargjaldi frá hesum innflutningi.

Tvey dømi um bilprísir í dag:

	Dømi 1	Dømi 2
Saml.kostn.frokn.vinngin	106.000	81.000
Meirvirðisgjald	26.000	20.000
	132.000	101.000
Virðisgjald	80.000	46.000
Vektgjald	24.000	21.000
Tilsamans	**236.000**	**168.000**

Tann dýrasti parturin av bilprísinum er virðisgjaldið. Í fyrra dømiunum er tað uml. 107% av virðisgrundarlagnum, meðan tað í seinna dømiunum er uml. 83%. Prosenttølini av samlaða kostnaðinum frokn. vinningi eru ávikavist 75% og 57%.

Meirvirðisgjaldið eigur at vera tað sama sum fyri aðrar vørur (í løtuni 25%, men í framtíðindi vónandi væl lægri), meðan vektgjaldið kann lækkast til 15 kr. pr. kg.

Harafturímóti eigur virðisgjaldið at verða nógv lækkað. Virðisgjaldið kann vera nakað hægri á dýrum (stórum) bilum enn á bíligum, men lækkingin eigur at vera lutfalsliga á øllum.

Fær omanfyri nevnda uppskot til samtyktar undirtøku frá meiriluta løgtingsins verður úrslitið av nevndu dømum hetta:

	Dømi 1	Dømi 2
Saml.kostn.frokn.vinning	106.000	81.000
Meirvirðisgjald	26.000	20.000
	132.000	101.000
Virðisgjald	24.000	14.000
Vektgjald	17.000	15.000
Tilsamans	**173.000**	**130.000**

Tann fyrri bilurin hevði verið kr. 63.000 ella 27% biligari, meðan hin seinni hevði verið kr. 38.000 ella 23% biligari.

Hóast hetta uppskot til samtyktar er minni frávik frá verandi skipan, meðan lógaruppskotið broytir verandi tollingarskipan av bilum munandi til nakað lagaligari, einfaldari og betri, so hevði henda samtykt helst eisini fört til, at sølan av bilum økist munandi. Neyvan er tað optimistiskt at rokna við, at sølan verður fleiri hundrað nýggir bilar næsta ár. Landskassin hevði av hesum lingið fleiri inntøkur av slíkari hækkan, enn hann fær við einki at gera.

Um henda lækking verður framd eftir uppskotinum til samtyktar, og 1000 bilar verða seldir, verður landskassans inntøka frá skrásetingargjaldi uml. 38 mió. kr., og meirinntøkan frá MVG fyri bilar uml. 20 mió. kr. Sostatt kann landskassin vinna millum 50 og 60 mió. kr. (umfram inntøkuskatt frá fólki í billavinnuni) við slíkari lógarbroyting. Tá er tað væl at merkja við at **lækka** avgjøld og **ikki** við at hækka tey.

1. viðgerð 29. november 1994. Málið var beint í skattanevndina, sum 17. februar 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum tann 22. november 1994 og aftaná fyrstu viðgerð tann 29. november 1994 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Fiunbogi Ísaksson, Karl R. Johansen og Vilhelm Johannesen) tekur ikki undir við uppskotinum, men vísir í staðin til broytingarnar í lógini um skrásetingargjald á motorakførum v.m., sum vórðu framdar í januar mánað 1995.

Minnilutin (Jørgin Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:
Fólkaflokkurin hevur leingi sæð tað neyðuga í at lækka biltollin. Fyri ári síðani legði flokkurin eitt uppskot hesum viðvíkjandi fyri løgtingið, sum tíanverri fall. Tann 22. november í 1994 royndi fólkaflokkurin aftur við at leggja fyriliggjandi uppskot fyri løgtingið. Nú raknaðu tingmenn og landsstýrið við, og uppskotið hjá fólkaflokkinum varð lagt niðast í skuffuna hjá skattanevndini, fyri at landsstýrið kundi leggja sítt egna uppskot fyri løgtingið, og hetta uppskotið kom ein mánað seinni.

Landsstýrisins uppskot hevði sama endamál, men hevði tó okkurt frávik sjálvandi. Tað málið varð samtykt og avgreitt úr løgtinginum áðrenn fyriliggjandi uppskot so frægt sum varð viðgjørt í skattanevndini. Eitt demokratiskt sað sera óheppin mannagongd.

Endamálið við uppskoti Fólkafloksins var at lækka biltollin, og er hetta mál nátt. Minnilutin setir tí einki uppskot fram.

Við 2. viðgerð 23. februar 1995 varð málið afturtikið.

36 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

Ár 1994, fríggjadagin 2. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 verur gjørd henda broyting:
Í § 27 verður sum nýtt stk. 11 sett:
"**Stk. 11.** Vørur kunnu verða innfluttar avgjaldsfrítt, um so er, at samsvarandi latingar her í landinum av tílíkum vørum framdar av avgjaldsskyldugum virkjum høvdu verið trítiknar fyri avgjald."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 foretages følgende ændring:
I § 27 indsættes som nyt stk. 11:
"**Stk. 11.** Varer kan indføres afgiftsfrit, såfremt tilsvarende leverancer her i landet af sådanne varer foretages af afgiftspligtige virksomheder, ville være fritaget for afgift."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins er uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 192 frá 10. desember 1993 um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald.

Lógin, sum varð framløgd í Løgtinginum 19. oktober 1992 sum uppskot um meirinntøku til landskassan, varð mett at geva umleið 200 mió. kr. fyri 3 hálvár. Henda meting hevur vist seg at hava hildið, og hevur lógin tí virkað eftir ætlan.

Í tíðarskeiðinum lógin hevur verið galdandi, hevur tó vist seg tørvur á at broyta nakrar ásetingar í lógini, deils so lógin gerst lættari t umsita, men eisini fyri at bøta um viðurskifti, har árinið av lógini í dag ikki tykist so heppið.

Lógin var upprunaliga bert ætlað at virka sum fyribilslóg, og skuldi sostatt bert hava gildi í parti av 1993 og í 1994. Í samband við fyrircikingarnar av gíggjarlógini fyri 1995 hevur tað tó vist seg, at tørvur er á at lata verandi lóg halda áfram, tó í nakað broyttum líki, so landskassin m.a. við hesum lógaruppskoti lann tryggja sær tann inntøkutørv í fíggjarlógaruppskotið fyri 1995 setur.

Í hesum uppskotið verður m.a. skotið upp at frítaka peningastovnar og tryggingarfeløg fyri avgjald, og kemur hetta sjálvsagt at kosta landskassanum ein inntøkumiss í mun til galdandi reglur, eins og lækkingin av avgjaldinum førir við sír minni inntøku. Í hesum viðfangi skal tó verða víst til uppskotið um at hækka rentuskattin úr 22% í 35%, og sum í løtuni er til viðgerðar í Løgtinginum.

Annars eru broytingarnar, sum við hesum uppskoti verða lagdar fram, flestar meir av lógartekniskum slag, og hava ikki árin á inntøkutølini hjá landskassanum.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

1) § 2 verður í hesi broyting orðað av nýggjum og eisini broytt innihaldsliga. Høvuðsbroytingin eru nýggju ásetingarnar í § 2 nr. 1, har skotið verður upp, at avgjaldsmæssiga at javnseta eftirlønaruppsparing og aðrar uppsparingar í føroyskum tryggingarfelag við tær avgjaldsreglur, sum longu eru í gildi fyri eftirlønaruppsparingarnar í føroyskum peningastovnum. Eftir hesum reglum kemur sostatt figgjarognaravgjald at verða lagt á uppsparda virðið á eftirlønarskipanum og lívstryggingum í føroysku tryggingini.

   § 2 nr. 3 verður broytt, soleiðis at føroysk lánsbrøv fáa eina serstøðu eins og partabrøv, og lutaprógv í føroyskum feløgum við at tey verða frítikin fyri avgjald eftir hesi lóg.

   Viðv. § 2 nr. 3 sum viðvíkur avmarkingini av hvørji virðisbrøv eru fevnd av lógini og hvørji ikki eru tað, var undir viðgerðini av lógaruppskotinum og í umsitingini gingið út frá, at tey pantibrøv og skuldarbrøv, ið eru undantikin vóru vanlig pantibrøv og skuldarbrøv fíggingarstovnanna og er greinin eisini vorðin umsitin á hendan hátt. Neyðugt hevur tó víst seg, at fáa umorðað galdandi reglur so at ásetingin gerst skiflígari. Eftir uppskotinum skuldi hereftir verið greitt, at pantibrøv og skuldarbrøv sum eru liður í vanliga fíggingarvirksemi hjá avvarðandi fíggingarstovni ikki eru undir avgjaldsskyldu, meðan onnur virðisbrøv hjá stovninum so sum partabrøv og lánsbrøv/obligatiónir eru undir avgjaldsskyldu.

   Í hesum sambandi er tó eisini vert at vísa, at sambært broyting nr. 5 gerast føroyskir peningastovnar og føroysk tryggingarfeløg avgjaldsfrí. Hendan frítøkan er tí bert relevant í mun til aðrar fíggingarstovnar, ið eru undir avgjaldsskyldu.

   Sum fylgitolking fyri hvat skiljast skal sum virðisbrøv er gjørd ávísing til galdandi virðisbrævaskattalóg.

2) Broyting nr. 2 er bert fylgibroyting av nr. 1).

3) § 3 nr. 1, viðvíkur avgreinsanini fyri hvørjir persónar eru undir avgjaldsskyldu og hvørjir eru frítiknir. Neyðuga útgreinanin kemst av, at sum meginregla er ein og hvør, sum hevur innistandandi í Føroyum, tað verði seg sum innistandandi í

føroyskum peningastovni, postgiro ella sum eftirlønarskipan ella lívstrygging í Føroyum, undir avgjaldsskyldu. Men landsstýrið metir rættast vera, at avgjaldsskyldan verður avgreinsað til at fevna um teir skattgjaldarar, sum eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, og eru búsitandi her. Viðmerkjast skal, at tá tað í hesum viðurskiftum verður tosað um bústað, eru tað skattligu týdningurin av bústaði, so sum hesin er í mun til reglurnar í § 1 nr. 1 í skattalógini, sum er galdandi.

Broytingin førir ikki við sær broyting í mun til verandi støðu um, hvør er undir avgjaldsskyldu, men er ein umorðing so reglan gerst meir eintýðug.

4) Í § 3, nr. 2 er ásett, at útlendsk felløg ikki koma undir avgjaldsskyldu. Eisini eru nevndir aðrir felagsskapir, ið ikki koma undir skattskyldu, og er her tá sipað til útlendskar felagsskapir. Ásetingin verður við broytingini meir greið, so at skilligt er, at talan bert er um fritøku fyri útlendskar felagsskapir. Hetta kemst av, at mong felløg, sum eru undir skattskyldu eftir § 1, nr. 14 í skattalógini, hava skilt hesa áseting, sum um tey eru fritikin fyri avgjaldsskyldu, í og við at tey eftir skattalógini bert eru skattskyldug av ávísum inntøkum, t.v.s. inntøkum av vinnuvirksemi. Hetta er tó ikki so. Hesi felløg eru fyri tað fyrsta ikki útlendsk felløg, og fyri tað næsta eru tey øll undir skattskyldu eftir § 1, nr. 14, hóast vanliga skattskyldan er skerd til ávísa inntøku.

Við at undirstrika, at fritøkan bert er galdandi fyri útlendsk felløg v.m., skuldu allir misskiljingarmøguleikar verið beindir av vegnum.

5) Broyting nr. 5 er uppskot um at fríta føroyskar peningastovnar og tryggingarfelløg fyri avgjaldsskyldu eftir hesi lóg, so avgjald ikki verður kravt av plaseringum teirra, hvørki í útlandinum ella her, tað verið seg sum innskot í peningastovn ella í virðisbrøv.

6) Her verða dagførdar tær ásetingar, sum eru neyðugar, fyri at fáa gjøgnumført fritøkuna, sum ásett er í § 3, nr. 13.

7) Í hesi broyting er orðað ein heimild hjá Toll- og Skattstovuni til at krevja inn møgulig avgjøld, ið eitt nú peningastovnar av ymiskum grundum ikki hava fingið kravt inn saman við rentutilskrivingini. Í slíkum førum verður rokning útskrivað frá Toll- og Skattstovuni til viðkomandi avgjaldsskylduga.

8) Í samband við at tryggingartakarar nú beinleiðis gerast avgjaldsskyldugir av uppspardu ogn teirra í eftirlønarskipanum og lívstryggingum, er her skotið upp, at avgjaldið eftir hesi lóg verður kravt av tí peningangøgd, ið má metast at svara til saldo á eini eftirlønarskipan, um hendan var í einum peningastovni. Avgjaldsgrundarlagið, ið sjálvt avgjaldskravið verður útroknað eftir, verður tí her skotið upp at vera tað í tryggingini uppsparda virðið troknað bonus. Eins og í førunum tá talan er um peningastovnsviðurskifti, gerst skipanin mest einføld at umsita, við at tryggingarfelagið fær álagt uppkrevjingarskylduna.

Tryggingarfelagið skal hereftir eftirhalda avgjaldskravið í tí annars útroknaða bonuságóðanum á tí einkultu skipanini. Avroknast skal til landskassan á sama hátt, sum galdandi fyri peningastovnar, t.v.s. 15. í mánaðinum aftaná tilskriving er farin fram og eftirhaldið er vegna landskassans avgjaldskrav.

9) Her verður skotið upp at flyta innsendingardagin fyri tey avgjaldsskyldugu, ið hava innistandandi í útlandinum ella hava ogn í virðisbrøvum, ið skal rindast avgjald av, til at vera 15. mars, so innsendingin í flestu førum kann gerast saman við innlatan av sjálvuppgávuni.

10) Her er bert talan um umorðing av verandi áseting, og hevur hetta ikki nakra innihaldsliga broyting við sær.

11) Toll- og Skattstovan fær sum neyðugt amboð í arbeiði sínum heimild at gera meting av avgjaldsgrundarlagi hjá einum avgjaldsskyldugum, ið viðkomandi ikki sum fyriskrivað letur inn uppgerð. Landsstýrinum verður heimilað at fyriskriva neyvari reglur fyri metanini, tá slík viðurskifti vanliga krevja neyvar reglur at fara eftir, so vissa kann vera fyri, hvussu tílíkar metingar fara fram og fyri at skapa lívaviðgeð fyri allar metingar av hesum slag.

12) Í mun til galdandi reglur verður avgjaldssatsurin lækkaður úr 1,9% í 0,6% p.a.

13) Galdandi 25% avgjaldssatsur á ognarvinningi úr útlandinum verður her lækkaður til 15%. Her skal viðmerkjast, at tá tey 15% verða roknað, verða tey roknað av útlendska bruttoognarvinninginum, og at tað tískil í hesum viðurskiftum ikki verður lækkað í avgjaldsgrundarlagnum fyri møguiig útlendsk avgjald ella skattir av somu inntøku.

14) Eins og ásett er fyri fíggjarognaravgjald av innistandandi ogn í Føroyum, verður avgjald ikki kravt, um áljóðandi virði fyri ognirnar av hesum slagi, um tær tilsamans eru undir 2.500 kr.

16) Her verður heimildin í verandi § 13 umorðað, so greitt er, at tær reglur, sum kunnu nágreinast í kunngerð um fyrisitingina av lógini, eisini kunnu innihalda tær neyðugu ásetingarnar fyri at tryggja, at tann inntøka og ogn, ið hoyrir til tíðarskeiðið, lógin er galdandi fyri, veruliga koma til skattingar, so sum ætlað.

17) - 20)
Gildisreglurnar verða broyttar sum vylgja av avgerð landsstýrisins um framhaldandi at hava hesa lóg í gildi. Sum er, skuldi lógin farið úr gildi um ársskiftið, men við hesum broytingum verður lógin verandi í gildi uttan tíðaravmarking.

Fyri at undirstrika týdningin av, at tær inntøkur og ognir, sum tilhoyra viðkomandi tíðarskeiðinum, ið lógin er galdandi fyri, eisini koma til skattingar, er sum stk. 6 skotin upp áseting um, at avgerandi fyri, um avgjaldið kann krevjast eftir reglunum í hesi lóg, ikki er útgjaldingarpunktið, men innvinningartíðs-

punktið, t.v.s. tað tíðarskeið, ið ogn og møguligur ognarvinningur viðvíkur.

1. viðgerð 5. desember 1994. Málið var beint í rættarnevndina, sum 19. desember 1994 soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. december 1994 og eftir 1. viðgerð 5. í sama mánaða beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini hildið fund við Toll- og Skattstovuna 12. december 1994.

Undir viðgerðini varð spurningurin reistur, hvussu er við avgjaldi, tá bøkur verða prentaðar á útlendskum prentsmiðjum. Toll- og skattstovan upplýsti, at meirvirðisgjald verður goldið av hesi tænastu uttan mun til, um prentingin fer fram í Føroyum ella uttanlands.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. desember 1994. Málið samtykt við 21-0.

3. viðgerð 22. desember 1994. Málið endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

Lóg nr. 125 frá 22. desember 1994.

37 Kanning av møguligum óregluligum politiskum og umsitingarligum avgerðum frá 1980 og frameftir

Ár 1994, fríggjadagin 2. desember legði rættarnevndin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

1) Løgtingið samtykkir at seta 3. manna tingnevnd samb. grein 18 í stýrisskipannarlógini at ganga ígjøgnum og kanna møgulig óreglulig viðurskifti í politiskum og umsitingarligum avgerðum, og um staðfestast kann ein politisk/umsitingarlig ábyrgd í hesum sambandi.

2) Kanningin verður grundað á tær upplýsingar, sum komnar eru fram í frágreiðingunum frá landsgrannskoðaranum og løgtingsgrannskoðarunum.

3) Tá kanningin er gjørd, verður úrslitið lagt fyri løgtingið at taka støðu til.

4) Fíggjarligur stuðul verður veittur nevndini til tess at útvega neyðuga sakkøna hjálp til kanningararbeiðið.

Viðmerkingar:

Grein 18 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um Stýrisskipan Føroya í sermálum er soljóðandi:

"Tingið kann skipa nevndir av tingmonnum at kanna almenn týðandi mál. Tílíkar nevndir hava rætt til at krevja skrivligar ella munnligar frágreiðingar frá privatum borgarum eins og frá almennum embætismonnum. Val av nevndarmonnum og umboðan fer fram við lutfalsvali".

Endamálið við hesi kanning er at fáa greiðu á, um nøkur politisk og/ella umsitingarlig ábyrgd kann staðfestast í sambandi við ávís ivasum viðurskifti, sum lands- og løgtingsgrannskoðararnir hava víst á í nøkrum sera atfinningarsomum frágreiðingum, serstakliga viðvíkjandi almennum láni- og veðhaldsheimildum, umfram krøvum viðvíkjandi eginpeningi í sambandi við skipabygging.

Mett verður, at umrødda heimild í stýrisskipannarlógini kann nýtast á ein slíkan hátt, at ein haldgóð og forsvarlig kanning kann fremjast á hesum grundarlag.

Mælt verður til, at arbeiðssetningurin hjá nevndini verður avmarkaður til bert at viðgera tey ítøkiligu viðurskiftini, sum nevnd eru í viðkomandi grannskoðarafrágreiðingum, fyri á tann hátt at seta greiðar karmar um uppgávu og endamál við kanningini.

Tá ein slík víttfevnandi og djúptøkin kanning ikki í praksis kann fremjast av leikmonnum einsamøllum, verður skotið upp, at kanningarnevndin aftrat sær fær sakkønan løgfrøðisligan stuðul, sum kann verða ein trygd fyri neyðugari dygd og góðsku í tí arbeiðsavriki, sum nevndini er álagt at avgreiða.

Talan má verða um rættiliga vælkvalifiseraðan serkunnleika, sum ikki er heftur at føroyskum politiskum/umsitingarligum/lokalum/fíggjarligum og/ella persónligum seráhugamálum.

Fyri at eingin ivi skal verða um óheftu støðu hjálparmansins, verður mælt til, at hesin verður ein útlendingur, sum við hollari útbúgving og drúgvum royndum hevur skapt sær virðing innan løgfrøði og statsvísund.

Tá nevndin er sett og hevur fingið sær serkøna hjálp til arbeiði sítt, verður skotið upp, at nevndin saman við hjálparmanninum í fyrsta atløgu gjøgnumgongur alt tilfarið við tilhoyrandi skjølum.

Eftir at hetta arbeiði er lokið, verður við heimild í stýrisskipannarlógini farið undir avhoyringar av politikarum, embætismonnum og privatum borgarum.

Endamálið má sjálvsagt verða at fáa eitt so haldgott og fullfíggjað grundarlag undir eini endaligari niðurstøðu, sum yvirhøvur til ber.

Ilt er at meta um útreiðslurnar av eini slíkari kanning frammanundan, men talan verður neyvan um minni enn 500.000 kr. í fyrsta umfari. Henda upphædd er játtað á fíggjarlógini fyri 1995, og verður tørvur á meira peningi, má løgtingið verða til reiðar við eini eykajáttan til hetta endamál.

Tá tað hevur skund at fáa hetta mál avgreitt, verður roknað við, at Føroya Løgting gevur tí eina skjóta og positiva viðgerð.

1. viðgerð 17. februar 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 1. juni 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram tann 27. januar 1995 og var eftir 1. viðgerð tann 17. februar 1995 beint í rættarnendina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd rættarnevnd til, at sett verður ein 3 manna nevnd av løgtingsmonnum samb. § 18 í stýrisskipanarlógini at kanna ávís

ivasom viðurskifti í landsumsitingini við støði í grannskoðara- og løgtingsgrannskoðarafrágreiðingunum frá 1980 og framefter.

Innihaldið í nevndu frágreiðingum gevur greiðar ábendingar um álvarligar skeivleikar og politiskt og umsitingarligt ábyrgdarloysi í føroyska samfelagnum.

Skal rættarnevndin varðveitast og álitið á samfelagsskipanina endurreisast, er tískil neyðugt við eini djúptøknari kanning av hesum viðurskiftum.

Eisini hevur ein slík kanning ovurstóran týdning fyri almenna umdømi føroyinga, sum ofta hevur liðið undir skuldsetingum um at vilja dylja og káva út yvir egin ivasom viðurskifti, meðan ólíka lættari hevur verið at givið øðrum skuldina fyri óskilið, sum hevur valdað innan bæði politisk, umsitingarlig og fíggjarlig viðurskifti v.m.

Aðalmálið er at útgreina og lýsa tey viðurskifti í sjálvari tí politisku skipanini, sum hevur verið orsøkin til teir skeivleikar og mistøk, sum umrødd eru í grannskoðarafrágreiðingunum.

Øll eru samd um, at tað er neyðugt og altumráðandi at fyribyrgja endurtøku av slíkum ivasomum avgerðum.

Tað eigur tí at viðurkennast, at um tað skal eydnast okkum at forða fyri, at somu mistøk verða gjørd aftur, so krevur hetta, at ein neyv lýsing av orsøkunum til áður tiknar skeivar avgerðir, verður fingin til vega.

Hildið verður skilagott, at nevndin verður mannað við trimum persónum heldur enn færri ella fleiri timum, tá tað av royndum er staðfest, at hetta er eitt hóskandi tal, um nevndararbeiði av slíkum slagi skal vera skjótt og effektivt.

Umráðandi er at skapa virðing og álit um tað arbeiði, nevndin hevur sett sær fyri at greiða úr hondum. Veitast skal trygd fyri, at kanningin verður framd á einum høgum halddyggum støði, sum nøktar øll faklig krøv til dygd og førleika hjá tí ella teimum, ið skulu hjálpa nevndini við eini slíkari kanning.

Í hesum sambandi verður álagt nevndini at taka sær serkøna løgfrøðiliga hjálp til at taka sær av dagligu fyrisitingini, praktiska arbeiðinum við at savna saman tilfar fyrireika og skipa fyri fundum umframt at útgreina lýsingar og niðurstøður í fundarfrágreiðingunum.

Nevndin leggur dent á, at teir løgtingslimir, sum valdir vera í hesa kanningarnevnd eru fullkomuliga óheftir og ikki á nakran hátt kunnu leggjast undir at hava havt nakran leiklut í teimum avgerðum, sum umrøddar eru í grannskoðarafrágreiðingunum.

Endamálið við kanningini verður fyrst og fremst at geva eina gjølliga lýsing av teimum fyritreytum og tí framferð, sum vóru atvoldin til hesar avgerðir, og í hvønn mun manglar og brek í skipanini og/ella menniskjanslig mistøk vóru atvoldin til møguligu

skeivu avgerðirnar.

Herundir eigur at verða nomið við spurningin um evt. ófullfíggjað lógarverk, tørvandi samskipan av reglunum, og/ella vantandi fyrisitingarligur førleiki var ein grund til atfinningarsomu politisku og/ella umsitingarligu avgerðirnar í hesum tíðarskeiði.

Peningurin er tøkur til arbeiði nevndarinnar, nevniliga á fíggjarløgtingslógini 1995 § 10 10018 kr. 500.000,00. Er henda upphædd ikki nóg stór, so hvørt arbeiðið líður, kunnu nevndarlimirnir skjóta upp fyri løgtinginum, at eykajáttan verður veitt við løgtinglóg.

Út frá frammanfyri nevndu fyritreytum setir **ein samd rættarnevnd** fram soljóðandi:

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at seta eina tingnevnd av 3 løgtingsmonnum, samsvarandi løtingslóg nr. 1 frá 13.05.1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 2 frá 02.01.1985 § 18 (eftir Ólavsøkudag 1995 verður heimildin fyri kanningarnevndina løgtingslóg nr. 103 frá 26.07.1994 um stýrisskipan Føroya § 19).

Tey trý umboðini í nevndini verða vald av tinginum samb. uppskot.

Við støði í teimum málum og hendingum, sum m.a. eru lýstar í løgtings- og landsgrannskoðarafrágreiðingunum frá 1980 og frameftir, skal nevndin geva eina frágreiðing, sum verður løgd fyri løgtingið til støðutakan.

2. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið til samtyktar frá rættarnevndini samtykt við 18-0 atkvøðum.

38 Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar

Ár 1994, fríggjadagin 21. oktober legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar v.fl.

§ 1. Í fíggjarárinum 1994 veittur ein brenni- og samskiftisstudningur til pensjónistar við kr. 1.850,- til hvønn pensjónist.

§ 2. Brenni- og samskiftisstudningurin verður latin fólki, ið áðrenn 1. oktober 1994 hava fingið játtaða fólkapensjón, avlamispensjón ella einkjupensjón ella hava sent inn umsókn um slíka pensjón, tí rætturin til hana er vunnin, og seinni fáa pensjónina játtaða.

§ 3. Treytin fyri at fáa brenni- og samskiftisstudning er, at pensjónisturin ikki hevur hægri ársinntøku út um pensjónina enn 80.000 kr. fyri hjún og 60.000 kr. fyri støk. Til grund fyri útrokningini verður løgd inntøkan, sum nýtt verður í sambandi við útrokning av pensjónini pr. 1. oktober 1994. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensjónistar, eiga ein part í felag.

§ 2. Í fíggjarárinum 1994 verða úr landskassanum eisini veittar fólki, sum tann 1. oktober 1994 fáa hjalp sambært § 13 í forsorgarlógini, kr. 1.850,- í brenni- og samskiftisstudningi, undir somu treytum, sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ 5. Føroya Gjaldstova rindar brenni- og samskiftisstudningin.
Stk. 2. Annars fyrisitur Almannastovan

lagtingslov om brændsels- og kommunikationstilskud til visse pensionister m.fl.

§ 1. I 1994 ydes af landskassen et brændsels- og kommunikationstilskud til pensionister kr. 1.850,- til hver pensionist.

§ 2. Brændsels- og kommunikationstilskud ydes til personer, som inden den 1. oktober 1994 har fået bevilget folkepension, invalidepension eller enkepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

§ 3. Betingelsen for at få brændsels- og kommunikationstilskud er, at pensionisten ikke har højere årsindtægt udover pensionen end 80.000 kr. for ægtepar og 60.000 kr. for enlige. Til grund for beregningen lægges den indtægt, der anvendes i forbindelse med beregning af pensionen pr. 1. oktober 1994. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ 4. I finansåret 1994 ydes af landskassen også et brændsels- og kommunikationstilskud på kr. 1.850,- til personer, der den 1. oktober 1994 modtager hjælp efter forsorgslovens § 13, på samme betingelser som fastsat i § 3 i denne lov.

§ 5. Brændsels- og kommunikationstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldstova.
Stk. 2. I øvrigt varetager Almannastovan

brenni- og samskiftisstudningin.
Stk. 3. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri kærunevndina í almannamálum.

administrationen af brændsels- og kommunikationstilskuddet.
Stk. 3. Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan inden 4 uger indbringes for det sociale ankenævn.

§ 6. Brenni- og samskiftisstudningurin er ikki skattskyldugur.

§ 6. Brændsels- og kommunikationstilskuddet er ikke skattepligtigt.

§ 7. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Síðani 1980/81 hevur verið goldin pensjónistum v.fl. brennistudningur sambært løgtingslóg, ið einans hevur havt gildi fyri viðkomandi fíggjarár. Síðani 1988 hevur saman við brennistudninginum eisini verið latin ein stuðul til lutvísa rindan av samskiftisútreiðslum, so sum fast telefongjald, sjónvarpsgjald og útvarpsgjald.

Til 1990 var brenni- og samskiftisstudningurin kr. 2.200,-, og var játtanin á fíggjarlógini lagað eftir, at pensjónistar, ið uppfyltu treytirnar í § 3 í lógini, fingu hesa upphædd. Á fíggjarlógini 1989 var játtanin 7.360.000 kr. Síðani 1990 hevur játtanin á fíggjarlógini verið 6.500.000 kr. Upphæddin til hvønn pensjónist er tí seinastu árini lutfalsliga lækkað samsvarandi lækkaðu játtanini. Í 1990 og 1991 var brenni- og samskiftisstudningurin kr. 1.943,-, meðan hann í 1992 var kr. 1.928,-, og í 1993 kr. 1.569,-.

Sambært upplýsingum frá Almannastovuni er talið av pensjónistum mett at vera 3.514, og brenni- og samskiftisstudningurin fyri 1994 er tí ásettur til kr. 1.850,-.

1. viðgerð 27. oktober 1994. Málið var beint í almanna og heilsunevndina, sum 28. oktober 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 21. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð 27. oktober beint í almanna- og heilsunevndina.

Almanna- og heilsunevndin hevur viðgjørt uppskot landsstýrisins og hevur hesar viðmerkingar:

Undir 1. viðgerð av málinum var breið semja í tinginum um ikki at seinka málinum óneyðugt, fyri at tey, ið hava rætt til brenni og samskiftisstudning, kunnu fáa gleði av honum sum skjótast, nú árið fer at halla.

Nevndin tekur undir við, at lógaruppskotið verður broytt soleiðis, sum landsstýrismaðurin í almannamálum, Andrias Petersen, mælti tinginum til undir 1. viðgerð av málinum, at §§ 2, 3 og 4 í lógaruppskotinum verða broyttar soleiðis, at har, ið umsóknarfreistin fyri, at pensjónistar verða umfataðir av lógini, er 1. oktober 1994, skal umsóknarfreistin vera 1. december 1994. Landsstýrismaðurin metti hetta onga ávirkan hava á upphæddina til hvønn pensjónist. Upphæddin í lógaruppskotinum er sett at vera kr. 1.850 fyri fíggjarárið 1994.

Undir 1. viðgerð varð fløt fram, at skipanin ikki tykist rættvís í ávísum serligum førum og eigur landsstýrið at kanna spurningin, um møgulig brek eru í skipanini, og um hetta er so, tá at taka stig til at broyta galdandi lóggávu. Samsvarandi hesum verður sett fram

broytingaruppskot

1) Eingin broyting.	1) § 1 affattes således: "I finansåret 1994 ydes af landskassen et brændsels- og kommunikationstilsskud på kr. 1.850,- til pensionister med kr. 1.850,-."
2) Í §§ 2, 3 og 4 verður "1. oktober" broytt til: "1. december".	2) I §§ 2, 3 og 4 ændres "1. oktober" til: "1. december".
3) Í § 4 verður heitið: "§ 2" broytt til: "§ 4".	3) Ingen ændring.

2. viðgerð 8. november 1994. Uppskotið við broytingum frá meirilutanum í nevndini samtykt við 28-0 atkvøðum.

Málið varð beint aftur í almanna- og heilsunevndina 10. november 1994, sum sama dag legði fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til 3. viðgerð

§ 1 í uppskoti landsstýrisins verður orðað soleiðis: "Í fíggjarárinum 1994 verður úr landskassanum veittur ein brenni- og samskiftisstudningur til pensjónistar við kr. 1.850,- til hvønn pensjónist."	§ 1 i landsstyrets forslag affattes således: "I finansåret 1994 ydes af landskassen et brændsels- og kommunikationstilskud til pensionister med kr. 1.850,- til hver pensionist."

3. viðgerð 10. november 1994. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 113 frá 22. november 1994.

39 Hækking av skattafría botnmarkinum og lækking av skattastiganum

Ár 1994, hósdagin 10. november legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum, við virkningi frá 1. januar 1995, at broyta skattastigan fyri lands- og kommunuskatt soleiðis:

0	-	30.000 kr.	0%
30.000	-	100.000 kr.	30%
100.000	-	200.000 kr.	40%
200.000	-	og yvir	50%

Viðmerkingar:

Uppskotið miðar eftir:
1. at hevja skattafría botnfrádráttin,
2. at lækka skattastigan,

3. at gera skattaskipanina einfaldari.
4. at søkkja marginalskattin úr verandi 76% niður í 50%,
5. at lætta skattatrýstið á lág-, miðal- og háinntøkur,
6. at minka neyðina hjá øllum inntøkubólkum at flýggja av landinum undan skattatrýsti,
7. at gera bruttoinntøkur skattskyldugar heldur enn eina netto inntøku eftir ymiskar frádráttir,
8. at gera skattgjaldingina meiri javna og forútsigiliga,
9. at skifta verandi rentufrádrátt út við ein nógv hægri fastan skattafrían botnfrádrátt,
10. at varðveita sama barnafrádrátt í landsskattinum sum nú,
11. at varðveita frádráttin fyri pensjónstryggingar,
12. at varðveita somu skattainntøkur sum nú til lands- og kommunukassar.

Hetta uppskot um lægri skattastiga er betri enn verandi skattaskipan, men tað munar langt í frá so væl sum tær skattaábøtur, ið fólkaflokkurin farnu tingsetu skeyt upp í sambandi við lægri kostnaðarstøði. Fólkafloksins uppskot í vár høvdu linkað marginalskattin úr verandi 76% úr niður í 50%.

Men helst er tíðin ikki búgvin til so frílynta skattaskipan. Ráðandi sosialistiski skattahugburðurin byggir á ta mannvondu fatan, at ein tímaløntur skattgjaldadi skal arbeiða fyri hitt almenna til kl. 2 hvønn seinrapart, og hin mánaðarlønti til 20. í hvørjum mánaði, áðrenn ein sleppur til arbeiðis fyri seg sjálvan.

Eftir hesum uppskoti sleppur hin tímalønti at arbeiða fyri egið húsarhald frá kl. 10 á morgni og hin mánaðarlønti frá 10. í hvørjum mánaði. Sjálvi tær hægstu inntøkurnar fáa altíð meir enn helming av egnum innsatsi burturúr. Soleiðis virkar borgarlig skattahugsan.

Hesin uppskotni skattastigin var grundarlagið undir tí borgarliga fíggjarpolitikki, ið ikki varð av nøkrum.

Uppskotið gevur tó sbrt. Toll- og skattstovu Føroya somu uml. 1.200 mió. kr. í samlaðum kommunu- og landsskatti sum verandi skattaskipan við sínum ótolandi skattatrýsti.

Verandi progressiva skattaskipan hevur spælt fallit og er ein aðalmeinbogi fyri trivnaðin. Peningaliga loysir sig næstan líka væl at vera arbeiðsleysur og eiga 40 tímar tøkar um vikuna fyri 70% av lønini, enn at arbeiða fyri bert 5 - 600 kr. meir eftir skatt um vikuna, t.e. uml. 10-15 kr. netto meir um tímin.

Hetta uppskotið hækkar verandi skattafría botnmarkið upp í 30.000 kr. frá verandi 12.000 kr. fyri kommunuskatt og 20.000 kr. fyri landsskatt. Sostatt verður møguligt hjá hvørjum skattgjaldara at forvinna upp í 30.000 kr. skattafrítt í einum skattaári. (Fólkaflokkurin hevur lagt annað skattauppskot fram um, at hjún við einari inntøku verða skattað javnbjóðis hjúnum ella støkum við hvør sínari inntøku, so hjún við einari inntøku fáa 2 x 30.000 kr. ella tilsamans 60.000 kr. í botnskattafrádrátti).

Hesin høgi botnfrádráttur er ætlaður at koma í staðin fyri rentufrádráttin, sum tó nú í mesta lagi er væl lægri enn hesin botnfrádráttur upp á 60.000 kr. fyri hvørt húskið.

Uppskotið gevur øllum inntøkubólkum lægri skattaprosent. Roknilømi frá Toll- og Skattasstovuni eru viðløgd, sum vísa, at t.d.:

Brutto inntøka	Skattaskyld. inntøka	Skattur 1994	Skattur uppskot	Munur	Prosent lækking
100.000	70.000	35.537	21.000	14.537	40,9
150.000	120.000	61.887	38.000	23.887	38,6
200.000	170.000	91.837	58.000	33.837	36,8
250.000	220.000	123.287	80.000	43.287	35,1
300.000	270.000	155.737	105.000	50.773	32,6
400.000	370.000	226.637	155.000	71.637	31,6
500.000	470.000	285.000	205.000	80.000	28,1

Omanfyri nevndu dømi eru uttan rentufrádrátt. Tey vísa, at allir inntøkubólkar sleppa lættari í skatti brutto, um hetta uppskotið verður samtykt og sett í staðin fyri verandi skattastiga.

Taka vit onnur viðløgd dømi um inntøkur, sum eru nóg høgar til at klára eitt nú eini nýggj sethús við tungum lánum og hava innbygt eitt so høgt rentugjald sum 50.000 kr. árliga við rentufrádráttí eftir verandi skattaskipan, so síggja vit hesa avleiðing av uppskotna skattastiganum:

Brutto inntøka	Skattaskyld. inntøka	Skattur 1994	Skattur uppskot	Munur	Prosent lækking
150.000	120.000	41.887	38.000	3.887	3,2
200.000	170.000	71.837	58.000	13.873	8,1
250.000	220.000	103.287	80.000	23.287	10,6
300.000	270.000	135.737	105.000	30.737	11,4
400.000	370.000	206.637	155.000	51.637	14,0
500.000	470.000	277.537	205.000	72.537	15,4

Í hesum dømum við høgum rentugjaldi eru lægstu inntøkurnar ikki tiknar við, av tí at tær ikki frammanundan klára at bera so nógv í rentugjøldum sum hægri inntøkur. Í teimum førum, tá skattgjaldarar hava minni enn 100.000 kr. í inntøku, er ofta talan um pensjónistar ella aðra inntøkuna í einum húsarhaldi av tveimum, har tann hægra inntøkan ber tyngdina av rentum og avdráttum av høgum lánum.

Hetta uppskot hevði gjørt, at tað altíð loysti seg at arbeiða og at forvinna meiri, tí skattgjaldarin hevði altíð átt meir enn 50 oyru eftir av seinast vunnu krónu. Jú lægri inntøkan er, jú linari hevði hon verið skattað. Eftir verandi skipan fer marginalskatturin

upp um 50% longu eftir, at skattgjaldarin forvinnur meir enn 75.000 kr.

Hetta uppskot til eina meiri bruttokenda skattaskipan hevði havt við sær, at ein stór inntøka, sum nú ofta verður lækkað munandi við ymsum frádráttum, hevði goldið lutfalsliga meiri skatt enn eftir verandi skipan. T.d. hevði 1 mió. kr. í bruttoinntøku borið millum 40 og 50 ferðir hægri skatt, enn ein bruttoinntøka upp á 100.000 kr. So hetta uppsskot er meiri sosialt rímiligt enn verandi progr va skipan, sum byggir á øvund og eitt "millimeturrættvísi", ið er endað við at kroy miðalinntøkurnar í einum ótolandi skattatrýsti millum 45 og 57% av brutto.

Hetta uppskot hevði ikki broytt verandi barnafrádrátt í skattinum.

Somuleiðis hevði skattatrekkið í afturhaldsskipanini verið javnari við hvørja útgjalding enn eftir verandi skiftandi útgjaldingum.

Uppskotið krevur broyting í lógini um kommunu- og landsskatt.

1. viðgerð 29. november 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 24. mai legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum tann 10. november 1994 og eftir 1. viðgerð 29. november 1994 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Kari Robert Johansen og Finnbogi Ísakson) tekur ikki undir við málinum.

Meirilutin vísir á, at við uppskotnu skipanini falla allir frádráttir burtur t.d. rentufrádráttur, barnafrádráttur, ferðafrádráttur o.s.fr. og við tað at einki ítøkiligt fyriliggur í løtini um, hvussu hesi skulu fáa viðurlag tá ið nýggja skipanin kemur í gildi, kann meirilutin ikki taka undir við uppskotinum.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) hevur hesar viðmerkingar.

Í einari roynd at yvirtala løgting og landsstýri at vraka verandi skattaskipan setti Fólkaflokkurin í heyst fram fyriliggjandi uppskot um eina nýggja, einfaldari og meiri lagaligari skattaskipan.

Undir drúgvu viðgerðini í Skattanevndini eru fingnar til vega fleiri útrokningar frá Toll- og Skattstovuni. Hesar vísa, at uppskotni skattastigin kann broytast nakað og vit fáa tó somu inntøkur til lands- og kommunukassar, sum vit fáa í dag.

Endamálið er at leggja allar frádráttir saman í ein botnfrádrátt, tó hevur barnafrádrátturin eina serstøðu, sum má takast við.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at leggja uppskot fyri løgtingið, so løgtingið við virkningi frá 1. januar 1996 kann avtaka verandi lands- og kommunuskattastigar og í staðin seta í gildi niðaufyristandandi felags skattastiga fyri lands- og kommunuskatt:

Er inntøkan	men minni enn	skal latast	av	og % av restini
0	30.000	0	0	0%
30.000	130.000	0	30.000	30%
130.000	230.000	30.000	130.000	40%
230.000		70.000	230.000	50%

Av tí at fleirtal ikki fæst á løgtingi fyri Fólkafloksins frílyntu heildarloysn, er henda uppskotna skattaskipan ein gongd leið (av fleiri) burtur úr verandi progressiva skattatrýsti, sum ger tað ógjørligt hjá fólki flest at greiða sínar fíggjarskyldur, sum køvir allan virkishug, og sum ger alt privat, vinnuligt og alment lønsemi ógjørligt.

Uppskotið kann bøtast á ymsan hátt og er mest ætlað at vísa, hvussu bruttoskatting ger, at tað loysir seg aftur hjá øllum at arbeiða, forvinna, spara saman og gera íløgur.

Uppskotið miðar m.a. ímóti:

1. at lækka skattastigan,
2. at hevja skattafría botnfrádráttin upp í 30.000 kr. (hjún 60.000 kr.),
3. at gera skattaskipanina so einfalda, at sjálvuppgávan rúmast á einum postkorti,
4. at lora marginalskattin úr verandi 70% niður í max. 50%,
5. at skatta brutto- heldur enn nettoinntøku, so øll inntøka kemur til skattingar,
6. at linka skattatrýstið á lág- og miðalinntøkum,
7. at gera skattgjaldingina javnari og meiri forútsigilia,
8. at varðveeita somu inntøkur sum nú til land og kommunur,
9. at útvega fólki størri orku at gjalda sethúsaskuld,
10. at skatta so, at tað loysir seg at arbeiða.

Uppskotið er bundið av verandi skattainntøkum hjá landi og kommunum. Kommunurnar

fáa sín part eftir avtalaðum lykli og skulu hava minst somu inntøkur sum nú.

Mest mun ger tað, at allar forvunnar inntøkur koma til skattingnar. Skattaprosentini kunnu verða enn lægri enn hesi matematiskt útroknaðu, um almennar útreiðslur verða lækkaðar. Linkað skattatrýst fær altíð positivar dynamiskar avleiðingar.

Hendu skattalækking hevði elvt fólki til meir arbeiði. Bruttoskattur hevði givið minni skattaspekulatión. Ein arbeiðseggjandi lágur marginalskattur hevði givið fleiri skattgjaldarar og sostatt breiðari skattagrundarlag og ikki ein breiðkun við at finna fleiri nýggjar hættir at skatta somu útpíndu skattaborgarar upp á. Tað almenna fær við uppskotinum størri skattainntøku, samstundis sum álíkning og innkrevjing blíva einfaldari, rættvísari og bíligari.

Umframt hevði tørvur á peningahjálp frá forsorgini og stuðul frá ALS minkað - og spart tí almenna pening, og gjørt enn lægri skattaprosent møgulig.

Hetta uppskot útilokar ikki, at trekkprosentini stigvíst kunnu lækka til ávikavist 20, 30 og 40% ella lægri, um aðrar fyritreytir verða lagaðar hareftir.

Uppskotið ger sjálvuppgávuna einfaldari. 30.000 kr. (60.000 kr. fyri hjún) í botnfrádrátti avloysir ta ørgrynnu av frádráttum, sum nú geva summum inntøkum (serliga teim høgu) høvi til at lækka bruttoinntøkuna niður á lægri skattaskylduga inntøku.

Uppskotið gevur tí almenna størri skattainntøkur og veitir sostatt fíggjarligt rúm fyri at varðveita barnafrádráttin. Men skulu allir frádráttir burtur, so ber tí at samsýna barnaforeldrum uttan fyri skattaskipanina, helst betur enn nú. Ein skipan at samsýna barnafamiljum eigur at verða verandi, eisini í framtíðini.

Fólkaflokkurin hevur í løgtingsmáli nr. 128/94 (Nýggj fólkatrygging) víst á útvegir fyri, hvussu pensiónstrygging fyri øll kann gjaldast inn um afturhaldsskipanina.

Onkur førir fram móti hesum uppskoti, at tað gevur ikki láginntøkum sama møguleika at draga stóra rentuútreiðslu frá inntøkuni við sama skattalætta sum nú.

Men hetta argument ímóti uppskotinum heldur ikki, tí flestu láginntøkur megna ikki nú at bera rentuútreiðslur av týdningi. Harumframt hevur sitandi samgonga við lóg ásett, at bert goldnar rentur kunnu verða drignar frá í sjálvuppgávuni, og tískil eru fólk við lágum inntøkum og høgum rentum útilokað frá hesum frádrátti. Útrokningar frá Føroya Sparikassa um fastar útreiðslur í einum húsarhaldi vísa, at inntøkr 200.000 kr. og minni megna ikki at rinda eitt oyra í rentum og hava hesi sostatt ikki møguleika at nýta rentufrádráttin. Rentufrádráttur í dag er bert galdandi fyri tey, ið klára seg.

Í nógvum førum eru tó láginntøkur mest ískoyti hjá húsarhaldum, sum verða borin uppi av eini størri høvuðsinntøku, sum eftir uppskotinum verður lagaligari skattað enn eftir verandi skattaskipan. Sostatt verður familja við tveimum inntøkum, onnur lág og hin

hægri, nógv betur fyri sum heild enn í dag.

Tað mest ótolandi við verandi skattaskipan er marginalskattatrýstið. T.v.s. skattur av seinast vunnu krónu. Ein yvirtími verður í dag skattaður við 70% og tað ger, at tað loysir seg ikki at arbeiða. Við hesum uppskoti verður marginalskatturin ongantíð meira enn 50%.

Hóast hetta uppskotið ikki er nøkur sethúsaloysn, so er hetta av Sethúsacigarafelagnum og øðrum samanborið "sethúsaloysnina" hjá landsstýrinum og vísir tað seg, at sethúsacigarar fáa eftir hesum uppskoti millum 20.000 og 30.000 kr. meira eftir skatt enn eftir uppskot landsstýrisins.

Viðløgd álitinum eru 9 skjøl, sum vísa útrokningar av uppskotinum.

Viðmerkingar til skjøl:

Skjal 1: vísir uppskotnu nýggju skattatalvuna við trimum skattastigum, ið Toll- og Skattstova Føroya hevur nýtt sum grundarlag fyri sínum útrokningum og samanbering við verandi skattaskipan.

Skjal 2: vísir fullfíggjaða útrokning av skatting av øllum inntøkum eftir verandi skattaskipan (innroknað kommunuskattaprosent 20% við ongum frádráttum). Eisini vísir talvan skatting av somu inntøkum eftir hesum uppskot. Síðan er teigur við krónulætta og ein teigur við prosentmuni millum verandi og uppskotnu skattaskipan.

Skjal 3: vísir nøkur stakdømi um inntøkur og skatt eftir tí verandi og tí uppskotna skattatrekkinum fyri persónar, sum í dag ongan frádrátt hava.

Hesi dømi vísa, at ein inntøka upp á 1 mió. kr. (uttan frádráttir) í dag rindar 15 ferðir so nógvan skatt sum ein inntøka upp á 100.000 kr., men at ein mió. inntøka eftir uppskotinum hevði rindað 20 ferðir so nógvan skatt sum ein 100 tús. kr. inntøka.

Legg til merkis, at háinntøkur eftir uppskotinum ikki longur sleppa at draga seg niður á nógv lægri skattskylduga inntøku við alskyns verandi frádráttum.

Skjal 4: Úrokningarnar hjá Toll- og Skattstovuni vísa, hvussu inntøkur og frádráttir høvdu verið út frá 1993-tølum eftir galdandi reglum. Síðan er víst, hvussu tey høvdu verið eftir uppskotinum.

Land og kommunur fáa heldur størri inntøkur eftir uppskotinum. Størsta orsøkin til tess er, at eftir uppskotinum koma allar inntøkur til skattingar. Høgar inntøkur kunnu í dag plasera sín pening soleiðis, at tær kunnu draga seg niðurá nógv lægri skattskylduga inntøku og fleiri av hesum draga seg í dag niður um null í skattskyldugari inntøku. Í verandi skattaskipan er roknað við stórum frádráttum í kautiónum, sum í framtíðini ikki eru loyvdar og tí skuldi talið fyri skattainntøkurnar eftir verandi skipan verið størri. Somulciðis er rentufrádráttur nú bert loyvdur at draga frá, um renturnar eru goldnar.

Hendan munandi minkaða útreiðslan hjá landskassanum er ikki tikin hædd fyri í útrokningunum, ei heldur á fíggjarlógini.

Skjal 5: sýnir føstu útreiðslurnar, sum Føroya Sparikassi metir eitt húsarhald við tveimum børnum má hava fyri at liva undir rímiligum umstøðum.

Hetta vísir, at einki verður til rentur og avdráttir, uttan so at inntøkan er hægri enn 122.712 kr. aftaná, at skattur er rindaður. Tað svarar til at inntøkur undir 200.000 kr. ikki kunnu rinda eitt oyra í rentum og tískil heldur ikki kunnu fáa rentufrádrátt.

Skjal 6: vísir somu húsarhald sum í skjali 5 (húsarhald við 2 børnum), sum í hesum føri hava lán upp á 800.000 kr. Hesi skulu við 30 ára annuitetsláni rinda 50.000 kr. í rentum og uml. 13.000 kr. í avdráttum um árið. Her sæst, at rentufrádráttur ikki kemur hesum húskjum til góðar, fyrr enn inntøkan kemur upp um 200.000 kr. og ikki virkar fult, fyrr enn inntøkan er komin upp á 350.000 kr.

Sum sæst gevur uppskot landsstýrisins um sethúsaloysn hesum húsarhaldi í besta føri 4.000 kr. meir um árið t.v.s. 333 kr. um mánaðin, meðan fólkafloksuppskotið gevur somu fólkum millum 20.0000 - 40.000 kr. meir um árið.

Myndin sýnir týdningin av barnafrádrátunum fyri tær heilt lágu inntøkurnar og tí er í hesum uppskoti mælt til ein ella annan hátt av samsýning til barnafamiljur.

Skjal 7: sýnir somu húsarhald sum í skjali 5 (húsarhald við 2 børnum), sum í hesum føri hava lán upp á 1.100.000 kr. Hesi skulu við 30 ára annuitetsláni rinda 75.000 kr. í rentum og uml. 15.000 kr. í avdrátti um árið. Her sæst, at rentufrádráttur ikki kemur hesum húskjum til góðar, fyrr enn inntøkan kemur upp um 200.000 kr. og ikki virkar fult, fyrr enn inntøkan hjá húsarhaldinum er komin upp á 450.000 kr.

Sum sæst gevur uppskot landsstýrisins um sethúsaloysn hesum húsarhaldi í besta føri 6.000 kr. meir um árið t.v.s. 500 kr. um mánaðin, meðan fólkafloksuppskotið gevur somu fólkum millum 20.000 - 30.000 kr. meir um árið.

Skjal 8: sýnir marginalskattatrýstið í dag sammett við tað nógv lægra í uppskotinum. Marginalskattur er skattur av seinast vunnu krónu.

Um ein persónur við 100.000 kr. í ársinntøku arbeiðir ein tíma cyka, noyðist viðkomandi at rinda 57% í skatti av yvirtímanum undir verandi skipan, men eftir uppskotinum bert 30%.

Við verandi skattaskipan eigur persónur við inntøku omanfyri 300.000 kr bert 30 oyru eftir av seinast vunnu krónu. Eftir uppskotinum altíð meir enn 50 oyru eftir.

Fyri allar inntøkubólkar verður marginalskatturin lægri eftir uppskot fólkafloksins, men lutfalsliga størst lætta fáa lág- og síðan miðalinntøkurnar.

Skjal 9: vísir, at eftir uppskotinum koma føroyskir sjómenn at gjalda nógv minni skatt enn starvsfelagar í Danmark (t.d. føroyingar, ið eru fluttir til Danmarkar), men eitt vet meir enn starvsfelagar á norskum skipum.

Uppskot fólkafloksins hevði steðgað fráflyting av sjómonnum uttan at gera mun millum føroyskar skattgjaldarar.

2. viðgerð 1. juni 1995. Málið fall við 8-0 atkvøðum.

40 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, hósdagin 27. oktober legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd hendan broyting:
Sum nýggj § 31 A verður sett:
"Hjúnafelagi, sum hjálpir til í vinnufyritøkum, landbúnaði o.ø., tá talan ikki er um eitt partafelag ella eitt smápartafelag, skal hava rætt til at býta inntøkuna sundur við hin hjúnafelagan við upp til 50% av inntøkuni, tó í mesta lagi 100.000 kr."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:
Som ny § 31 A indsættes:
"Medhjælpende ægtefælle i virksomhed, landbrug o.a., når der ikke er talen om et aktieselskab eller et anpartsselskab skal have ret til deling af indtægten med den anden ægtefælle med op til 50% af indtægten, dog højst 100.000 kr."

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1995.

§ 2.
Denne lov træder i kraft 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Støðan í føroyska samfelagnum gerst daprari og daprari. Fólk eru dapurskygd um framtíðina. Tey eru helst offur fyri tilvildarligari stýring, sum eingin í dag vil kennast við.

Tørvandi vilji og ræðslan fyri tí ókenda kann tí gera av við seinasta møguleikan at endurreisa búskapin á einum høgum moralskum støði.

Vinnulívið er lykilin til økta virðisskapan í búskapinum. Loysnin í vinnulívspolitikkinum er broyting, og neyðugt er tí at skapa eitt fjøltáttað vinnulív, ið fer væl við umhvørvinum.

Virksemið má økjast, men tað kann ikki økjast undir teimum umstøðum - bæði innan- og uttanlands - sum í dag, uttan at kostnaðarstøðið lækkar, og kostnaðarstøðið kann bert lækka við at effektivisera raksturin og við at lækka kostnaðarstøði munandi.

Í londunum kring okkum hava tey eina serliga skipan, sum danir kalla "medhjælpende ægtefælle". Við hesi skipan verður inntøka býtt sundur millum hjúnini eftir einum býtislykli. Í Føroyum er eingin møguleiki at býta inntøkuna millum hjúnafelagar, tað er beint tvørturímóti sera trupult hjá eini kvinnu t.d. at sleppa at skatta av landbúnaði, hóast hon situr við einum festi.

Heldur ikki "hjálpandi" hjúnafelagin hevur møguleika fyri at verða skattaður fyri seg, hóast viðkomandi tekur fult lut í arbeiðinum. Hetta er tí, at høvuðsreglan í okkara skattalólg er tann, at:

> "Giftur maður verður skattaður av allari inntøku sínari og inntøku konu sínar, tá tey búgva saman." (§ 4, 1. stk. í skattalógini).

Víðari stendur:

> "Kona, sum samskattað er við mannin, verður sett í skatt fyri seg av ... sjálvstøðugum virki ella vinnu uttan fyri vinnu og virki mansins." (§ 4, stk. 2, a, í skattalógini).

Tað eru røddir frammi av og á, sum royna at vísa á, at tað er órættvíst, at m.a. bøndur ikki hava møguleika at lata konuna skatta av einum parti av vinninginum, og at hjálpandi hjúnafelagin í øðrum vinnum ikki fær hendan møguleika.

Hetta uppskotið hevur til endamáls, at samstarvandi hjúnafelagar skulu hava somu skattarættindi í egnum virki sum hjá øðrum, ella eftir einum ávísum býtislykli, sum semja kann fáast um.

1. viðgerð týsdagin 8. november 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 21. desember legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 27. oktober 1994 og varð aftaná fyrstu viðgerð tann 8. november 1994 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Karl Robert Johansen, Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson) tekur undir við, at skattalógin eigur at verða broytt á hesum øki soleiðis, at skattingin av hjúnum, ið hjálpa til í vinnufyritøku hjá hinum hjúnafelaganum, verður meita rímulig, og setir tí fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at leggja fram uppskot til broyting í skattalógini, ið hevur við sær rímuligari skatting av hjúnafelaga, ið hjálpir hjúnafelaga í hansara vinnufyritøku.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) tekur í fyrstu lagi við uppskotinum frá Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki og í øðrum lagi við meirilutans uppskoti til samtyktar.

2. viðgerð 23. februar 1995. Málið fall við 8-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar samtykt við 28-0 atkvøðum.

41 Stuðulstiltøk til avreiðing og virkan av rávøru her á landi

Ár 1994, friggjadagin 21. oktober 1994 legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, vegna miðflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum sum skjótast at taka neyðug stig til at rávøra úr havinum í størst møguligan mun verður avreidd og virkað her á landi.

Viðmerkingar:
Tá handilssáttmálin við Europeiska Búskaparliga Felagsskapin (løgtingsmál nr. 13/1991) var til viðgerðar førdi undirritaði í álitinum til nevnda mál m.a. fram soljóðandi.
"Hvat fiskivinnuni annars viðvíkur, er tað nógv sum bendir á, at tað fer at vera kærkomið hjá EF at fáa rávøru úr Føroyum til europeiska fiskiídnaðin, og kann hetta lættliga gerast ein sonn vanlukka fyri 100 tals verkafólk, sum hava sítt dagliga yrki á flakavirkjum kring land okkara. Til tess at fyribyrgja eini slíkari møguligari gongd, verður neyðgt við politiskum tiltøkum.

Ein setningur hjá undanfarnu landsstýrum var at minka stuðulin - afturberingina - til fiskivinnuna, men tá sáttmálin við EF varð til viðgerðar í tinginum, varð dentur lagdur á, at hesin kom at minka so líðandi.

Tí kann tað ikki annað enn undra at so ógvusligar skerjingar júst eru framdar í afturberingini til fiskivinnuna, bert fá ár eftir at Handilssáttmálin við EF varð undirritaður.

Hesin brádligi niðurskurður í afturberingini til fiskivinnuna hevur havt sjónskar avleiðingar til ógagns fyri mangan fiskimannin.

Tí er tað eisini umráðandi at landsstýrið sum skjótast virkar fyri, at føroyski fiski- og útróðramaðurin fær tað fyri vøruna sum honum "tilkemur" og ikki hevur fyri neyðini at fara uttanlendis at selja. Tí væl skiljandi verður selt har, sum mest er at fáa fyri vøruna!!!

Tí er tað eisini umráðandi, at tá neyðig stig verða tikin til at rávøra í størst møguligan mun verður at avreiða viðgera her á landi, at fiski- og útróðramaðurin ikki tá kemur at liggja í "klemmu". Tað kann ikki verða rætt- ei heldur samfelagsligt skilagott, at vit sum fiskivinnutjóð skulu vera rávørusjálvtøkuhandil hjá europeiskum fyritøkum og

soleiðis stimbra arbeiðsskapandi tiltøkum á europeiska meginsandinum, samstundis, sum 4. hvør føroyingur gongur við hond í lumma.

Í eini tíð sum merkt er av stórum arbeiðsloysi og teim sosialu og menniskjaligu avleiðingunum hetta hevur við sær, eigur landsstýrið at leggja alla orku í at tað tilfeingið, sum fæst til høldar í størst møguligan mun verður hagreitt og virkað á virkjum í Føroyum.

Møgulig ósemja í landsstýrinum/samgongumi eigur ikki at forða fyri loysn á hesum máli.

1. viðgerð 28. oktober 1994. Málið var beint í ídnaðarnevndina, sum 21. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum 21. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð 28. oktober 1994 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og er **meirilutin** (Jógvan Adolf Johannessen, Jákup Joensen og Álvur Zachariassen) samdur um at ásanna, at arbeitt verður í landsstýrinum við at seta í verk arbeiðsskapandi tiltøk og setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan á Lakjuni) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 16. januar 1995. Málið fall við 10-0 atkvøðum.

42 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing

Ár 1994, mikudagin 14. desember 1994 legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

§ 1.

Í lógtingslóg nr. 17 frá 10. mars 1992 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 114 frá 25. november 1994 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 11, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Fyri tryggingartakarar har arbeiðsloysi var staðfest í tíðarskeiðnum frá 1. august 1992 fram til 7. november 1994 verður tryggingarútgjaldið útroknað eftir tí inntøkugrundarlagi, sum nýtt var av fyrstani tíð viðkomandi fekk rætt til útgjald. Í teimum førum har tryggingartakari, sum levndur er av hesi áseting, vegna inntøkugrundarlag verður verri fyri enn sambært ásetingini í stk. 1, verður inntøkugrundarlagið útroknað sambært stk. 1."

2) Í § 11 verður sum nýtt stk. 3 sett:
"Stk. 3. Fyri tryggingartakarar har arbeiðsloysið varð staðfest frá 7. november 1994 verður tryggingarútgjaldið grundað á 70% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar, jbr. tó § 9, áðrenn arbeiðsloysið hjá tí tryggjaða verður staðfest sambært § 12 býtt

lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejdsløshedsforsikring og arbejdsanvisning.

§ 1.

I lagtingslov nr. 17 af 10. marts 1992 om arbejdsløshedsforsikring og arbejdsanvisning, som senest ændret ved lagtingslov nr. 114 af 25. november 1994 foretages følgende ændringer:

1) § 11, stk. 2, affattes således:
"Stk. 2. For forsikringstagere, der har fået ledigheden konstateret i tidsrummet fra 1. august 1992 til 7. november 1994, bliver forsikringsudbetalingen beregnet efter det indtægtsgrundlag, som blev benyttet i den første tid, vedkommende fik ret til udbetaling. I de tilfælde, hvor forsikringstager, der er omfattet af denne bestemmelse, på grund af indtægtsgrundlaget bliver værre stillet end i henhold til bestemmelsen i stk. 1, bliver i indtægtsgrundlaget beregnet i henhold til stk. 1."

2) I § 11 indsættes som nyt stk. 3:
"Stk. 3. Hos forsikringstagere, der har fået ledigheden konstateret fra 7. november 1994, bliver forsikringsudbetalingen beregnet som 70% af A-indkomsten de seneste 12 måneder, jfr. dog § 9, inden ledigheden hos den forsikrede bliver konstateret i henhold til § 12 delt med 252 dage. I de til-

við 252 døgum. Í teimum førum har tryggingartakari, sum er fevndur av hesi áseting vegna inntøkugrundalag verður verri fyri enn sambært áseting-unum í stk. 1, verður inntøkugrund-arlagið tað sama sum fyrstu ferð arbeiðsloysið varð staðfest."

3) § 11, stk. 3-8 verða hereftir § 11 sttk. 4-9.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 7. november 1994 at rokna.

fælde, hvor forsikringstager, som er omfattet af denne bestemmelse, på grund af indtægtsgrundlaget bliver værre stillet end i henhold til bestem-melserne i stk. 1, bliver indtægts-grundlaget det samme som første gang ledigheden blev konstateret."

3) § 11, stk. 3-8 bliver her efter § 11, stk. 4-9.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra 7. november 1994 at regne.

Viðmerkingar:

Aftaná samtyktina av seinastu broytingunum í hesi lóg er landsstýrið komið eftir, at soleiðis sum lógin er orðað, verða bólkar av arbeiðsleysum verri fyri enn framman-undan. Orsøkin til hetta er tann, at hjá teimum, har arbeiðsloysið varð staðfest í tíðarskeiðnum frá 1. august 1992 til 7. november 1994, verður tryggingarútgjaldið útroknað eftir tí inntøkugrundarlagi, sum varð nýtt av fyrstan tíð viðkomandi fekk rætt til útgjald.

Henda reglan kann í einstøkum førum merkja, at tey, sum gjørdust arbeiðsleys frá 1. august 1992 til 7. november 1994, men sum hava havt arbeiði í tíðarskeiðnum, nú kunnu gerast verri fyri, um teirra upprunaliga inntøkugrundarlag er verri enn tað inntøkugrundarlag, sum tey hava upparbeitt sær í tíðarskeiðinum aftaná 1. august 1992.

Hetta heldur landsstýrið ikki vera rímiligt, og setur tískil uppskot fram, sum skal tryggja, at tryggingartakarar ikki gerast verri fyri vegna seinastu broytingini í lógini.

Líknandi reglur eru í hesi lógarbroyting gjørdar fyri tey, ið verða arbeiðsleys frá 7. november 1994.

Viðmerkingar til einstøku greinirnar:

ad 1): Sambært galdandi § 11, stk. 2, verður fyri tryggingartakarar, har arbeiðsloysið varð staðfest í tíðarskeiðinum frá 1. august 1992 fram til 7. november 1994, tryggingarútgjaldið útroknað eftir tí inntøkugrundarlagi, sum nýtt varð av fyrstani tíð, tá viðkomandi fekk rætt til útgjald.

Henda regla førir við sær, at tryggingartakari altíð skal hava útgjald eftir upprunaliga grundarlagnum, hóast tryggingartakari hevur upparbeitt sær eitt hægri útgjaldingar-grundarlag. Tessvegna skjýtur landsstýrið upp at broyta § 11, stk. 2, soleiðis at tryggingartakari, sum fevndur er av hesi áseting, og sum vegna inntøkugrundarlag verður verri fyri enn sambært áseting í stk. 1, skal inntøkugrundarlagaið vera útroknað

sambært stk. ????.

ad 2): Skotið verður upp, at tey, sum fáa arbeiðsloysið staðfest frá 7. november 1994, fáa tryggingarútgjaldið grundað á 70% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar, jbr. tó § 9, áðrenn arbeiðsloysið hjá tí tryggjaða verður staðfest sambært § 12 býtt við 252 døgum. Um so er, at tryggingartakari, sum fevndur er av hesi áseting vegna inntøkugrundarlag verður verri fyri enn eftir ásetingini í stk. 1, verður inntøkugrundarlagið tað sama, sum fyrstu ferð arbeiðsloysið hjá tí tryggjaða varð staðfest.

Henda regla, eins og pkt. 1 í hesi lógarbroyting, førir við sær, at tryggingartakari ongantíð verður verri stillaður við at taka upp arbeiði, og seinni koma aftur inn í skipanina.

1. viðgerð 19. desember 1995. Málið varð beint í arbeiðsmálanevndina, sum 21. desember 1994 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 14. desember 1994 og eftir 1. viðgerð 19. desember 1994 beint í arbeiðsmálanevndina.

Arbeiðsmálanevndin hevur viðgjørt málið og mælir **ein samd nevnd** til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. og 3. viðgerð 22. desember 1994. Málið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

Lóg nr. 126 frá 22. desember 1994.

43 Oljuboringar í Lopra

Ár 1994, fríggjadagin 28. oktober 1994, legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrið verður biðið um at kanna møguleikarnar fyri, at boringarnar í Lopra verða uppafturtiknar.

Viðmerkingar:

Í 1981 varð farið undir at gera royndarkanningar í Lopra. Árið fyri høvdu royndarboringar verið gjørdar í Vestmanna.

Í Vestmanna varð borað 660 metrar niður. Í Lopra varð borað 2178 metrar niður. Seismiskar kanningar, sum í 1988-1989 vórðu gjørdar í Lopra, siga frá, at 250 metrar longur niðri broytist undirgrundin.

Við tí áhuga, sum alsamt er vaksandi fyri føroysku undirgrundina og tí, sum undir basaltinum er, skuldi tað verið møguligt, at boringarnar í Lopra verða uppafturtiknar.

Víst verður í hesum sambandi á, at jást í hesum døgum er komið fram, at olja veruliga er funnin undir basaltlagnum. (BP-finningin við markið).

Arbeiðsloysið er stórt í Føroyum og serliga í sunnara parti av Suðuroynni.

Allir møguleikar eiga at verða troyttir fyri at venda gongdini. Nakrir av hesum møguleikum liggja í einari møguligari komandi oljuvinnu, sum kann útvega nógv nýggj arbeiðspláss, longu meðan kanningararbeiðið fer fram.

Tí eigur landsstýrið at kanna, um møguleiki er fyri at taka boringarnar í Lopra uppaftur.

1. viðgerð 23. november 1994. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 21. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki 28. oktober 1994 og eftir 1. viðgerð 23. november 1994 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við løgmann og umboð fyri oljuráðleggingarnevndina.

Nevndin fekk frágreiðing um at arbeiði í sambandi við oljukanningar á føroyskum øki og herundir eisini víðari boring í Lopra er í gongd.

Nevndin fekk eisini at vita at ráðleggingarnevndin miðar ímóti at oljufeløg sum hava áhuga í kanningunum eisini fara at gjalda fyri framhaldandi boring í Lopra fyri at fáa neyvari vitan. Ætlanin hjá oljuráðleggingarnevndini er tó, at føroyingar sjálvir standa fyri boringunum.

Vísandi til tað sum fram er komið er greitt at arbeiðið við víðari boring í Lopra er í gongd, og heldur ein samd nevnd at óneyðugt er við slíkum uppskoti og setir tí einki uppskot fram.

2. viðgerð 16. januar 1995. Málið fall við 10-0 atkvøðum.

44 Frádráttur fyri ferðing millum heim og arbeiðsstað

Ár 1994, týsdugin 8. november legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 33 verður sum nýtt nr. 13 sett:
"hjá persóni undir fullari skattskyldu, sum hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útróðrarpart, ein upphædd í samband við ferðing millum bústað og arbeiðsstað eftir reglunum í litra a - e:
a) Frádrátturin verður veittur við eini upphædd, sum verður roknað grundað á vanligu ferðaleiðina millum heim og arbeiðspláss við bili eftir einum kilometurtaksti, sum verður ásettur av Líkningarráð Føroya. Tá upphæddin verður ásett, verða útreiðslur til ferðing við bili lagdar til grund fyri ásetingina.
b) Frádráttur kann tó bert veitast fyri tann partin av ferðaleiðini, sum aftur og fram pr. arbeiðsdag er hægri enn 15 kilometrar. Serstøk skipan kann verða sett í gildi í teimum bygdum, har einki alment rutusamband er.
c) Fyri ferðing sjóvegis millum bústað og arbeiðsstað verður frádrátturin loyvdur svarandi til ferðakostnaðin á hægsta avslátt-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 33 indsættes som nyt nr. 13:
"hos en person under fuld skattepligt, der har lønindtægt, herunder indtægter ved partsfiskeri et beløb i forbindelse med befordring mellem bopæl og arbejdsplads efter reglerne i litra a - e:
a) Fradraget ydes for befordring frem og tilbage mellem sædvanlig bopæl og arbejdsplads og foretages med et beløb, som beregnes på grundlag af den normale transportvej ved bilkørsel efter en kilometertakst, der fastsættes af Ligningsrådet. Ved fastsættelse af denne takst lægges udgiften til befordring med bil til grund.
b) Fradrag kan dog kun foretages for den del af befordringen, som frem og tilbage pr. arbejdsdag overstiger 15 kilometer. Særforordning kan ikraftsættes for de bygder, som ikke har offentlig ruteforbindelse.
c) For befordring ad søvejen mellem bopæl og arbejdsplads tillades et fradrag, der svarer til

arstigi fyri persón uttan flutningstól.

d) Landsstýrið kann áseta neyvari reglur um fyrisitingina av hesum reglum, herundir reglur um, hvussu vanliga ferðaleiðin verður fastløgd.

e) Verður mottikið fult ella partvist ferðaendurgjald eftir § 29, nr. 7, kann frádráttur ikki veitast eftir hesum reglum fyri ta ferðing, ið er grundarlag fyri ferðaendurgjaldinum."

2) Í § 47, stk. 3, verður "15%" broytt til: "16%".

billetpris med størst rabat for person uden befordringsmiddel.

d) Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om administrationen af disse regler, herunder regler om, hvordan den normale transportvej fastlægges.

e) Modtages hel eller delvis skattefri befordringsgodtgørelse efter § 29, nr. 7, kan der ikke foretages fradrag for den befordring, der har dannet grundlag for godtgørelsen."

2) I § 47, stk. 3, ændres "15%" til: "16%".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er lýst, og er galdandi frá og við inntøkuárinum 1995.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen og har virkning fra og med indtægtsåret 1995.

Viðmerkingar:

Nú tíðirnar eru truplar hjá fólki, heldur Kristiligi Fólkaflokkurin tað vera rætt, at fólk fáa møguleika fyri at draga ávísa upphædd av á sjálvuppgávuni fyri ferðing millum bústað og arbeiðsstað, og er hetta gjørt í sama mun, sum gamla skipanin var.

Í sambandi við hesi viðurskiftir er Toll- og Skattstova Føroya áður biðin um at koma við upplýsingum um, hvussu nógv ein slík skipan kostar landskassanum, og hvat hon kostar tí einstaka skattaborgaranum í teimum ymsu oyggjunum, t.d. suðuroyingum, norðoyingum og eysturoyingum at koma til og frá bústaði og arbeiðsstað, men Toll- og Skattstovan segði frá, at teir ikki beinleiðis vóru førir fyri at finna tær umbidnu upplýsingarnar, tí tílíkar upplýsingar ikki eru tøkar í skattaskipanini.

Toll og Skattstovan hevur tó upplýsingar um, hvussu stórur ferðafrádrátturin hevur verið sambært sjálvuppgávuni 1988 - 1992:

	1988	1989	1990	1991	1992
Ferðafrádráttur	9	10	10	11	11

Hetta uppskotið verður mett at kosta 9 mió. kr. fyri 1995.

Kristiligi Fólkaflokkurin heldur tað vera órímiligt, at ávísir partar av landinum skulu hava stórar útreiðslur av at ferðast millum bústað og arbeiðsstað, meðan aðrir ikki skulu

hava tað, og mælir tí til í hesum uppskotinum, at skipanin verður sett í gildi aftur.

Toll- og skattstovan hevur áður mett, at umsitingarligu royndirnar hava sýnt, at ferðafrádrátturin ikki eigur at verða settur í gildi aftur í sama skapi, sum hesin varð inntil 1. januar 1993, tá ferðafrádrátturin varð settur úr gildi. Hetta kemst av, at í mun til búskaparliga týdningin av ferðafrádráttinum kemur alt ov nógv umsitingarorka at verða nýtt til eftirkannan av viðurskiftum, sum eru avgerandi fyri frádráttin, so sum eftirkannan av ferðaætlan og arbeiðstíð og metan um almenna rutusambandlið kann nýtast ella ikki, eisini í mun til, hvat kann góðkennast sum ein hóskandi bíðitíð o.s.fr. Besta dømið um, hvussu fløkt umsitingarligu viðurskiftini hava verið av gomlu skipanini, eru tey mongu kærumálini um somu viðurskifti.

Hetta er eisini orsøkin til, at Kristiligi Fólkaflokkurin mælir til eina einfaldari skipan, sum er lættari at umsita hjá myndugleikunum. Í staðin fyri gomlu skipanina við ferðafrádrátti verður sett í gildi ein skipan við ferðafrádrátti, har frádrátturin objektivt er tengdur at, hvussu langa vegalongd viðkomandi hevur frá heimi til arbeiðsstað eftir vanligari farleið við bili. Hervið er eisini sagt, at frádrátturin ikki heilt er tengdur at, hvussu tann einstaki veruliga kemur aftur og fram til arbeiðis, og hvussu stór ella ymisk útreiðslan er fyri tann einstaka alt eftir ferðahátti.

Hildið verður rætt, at frádrátturin eigur at verða treytaður av, at tann skattskyldugi yvirfyri skattamyndugleikunum upplýsir talið av arbeiðsdøgum og tal av koyrdum kilometrum pr. arbeiðsdag millum heim og arbeiðsstað. Uttan mun til hvønn flutningshátt, tann skattskyldugi velur, verður farleiðin roknað grundað á tí vanligu ferðaleiðini við bili. Til hesa nýtslu kundi hóskandi í kunngerð verið ásett, at almenna uppmátingin er avgerandi fyri fjarstøðuna. Við vanligari ferðaleið við bili kann tá verða skilt tann vegalongd, sum koyrast skal við bili, tá atlit verður tikið til hesi viðurskifti:

a) givnu geografisku viðurskiftini
b) tíðarnýtslan
c) fíggjarliga rímiligheit.

Um tann skattskyldugi grundað á hesi viðurskifti á øllum ella parti av farleiðini er noyddur at nýta ferjusamband, verður ferðafrádrátturin roknaður soleiðis, at tann skattskyldugi kann við skjalprógvi draga frá veruligu útreiðslunum til ferjutransport, tó bert á hægsta avsláttarstigi fyri persónin, meðan ferðing á landi fylgir vanligu reglunum.

Øll hesi nevndu viðurskifti eiga at verða neyvari lýst í kunngerð og er tí í fyrstu syftu bert avgerandi at fáa lýst meginfyritreytirnar fyri frádráttinum í lógini.

Frádrátturin eftir hesum reglum kann loyvast í tann mun, dagligu útreiðslurnar til ferðing fara upp um eina upphædd svarandi til útreiðslur til 15 km ferðing pr. arbeiðsdag roknað eftir vanligu ferðaleiðini. Frádrátturin er tá fyri ferðing omanfyri 15 km.

Dømi um rokning av ferðafrádráttí:

Vegalongd aftur og fram millum heim og arbeiðsstað pr. arbeiðsdag	50 km
Herav altíð frádrigið	15 km
Tilsamans frádrátt	35 km

Kortini heldur Kristiligi Fólkaflokkurin tað vera rætt, at ein serstøk skipan eigur at galda fyri tær bygdir, sum einki alment rutusamband hava, og eigur hendan skipanin at verða sundurgreinað í kunngerð.

1. viðgerð 8. desember 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 17. februar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 8. november 1994 og aftaná fyrstu viðgerð tann 8. desember 1994 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Karl R. Johansen, Vilhelm Johannesen og Finnbogi Ísaksson) tekur ikki undir við uppskotinum, men vísir til broytingarnar í skattalógini, ið vórðu gjørdar í løgtingsmáli nr. 31/1994, har ferðafrádrátturin varð settur í gildi aftur.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) tekur undir við uppskotinum frá Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 23. februar 1995. Málið fall við 7-0 atkvøðum.

45 Skattafrí pensjón

Ár 1994, hósdagin 10. november legði Jákup Olsen, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 29, nr. 13, verður orðað soleiðis: "ellisviðbót eftir § 10, persónlig viðbót eftir § 14, hjálpar-, røktar- og avlamisviðbót eftir § 16 og grundupphæddin sbrt. § 3 fyri persónar, ið hava fylt 67 ár eftir løgtingslóg nr. 58 frá 15. mars 1967 um fólkapensjón við seinni broytingum, sbr. tó 2. punktum, avlamisgjøld eftir § 4, stk. 2, hjálpar- og røktarviðbót eftir § 11, persónlig viðbót eftir § 15, avlamisveiting, hjálpar- og røktarviðbót hartil eftir § 16, veitingar eftir §§ 9, 15, 16, 17 og 18 og persónligar viðbøtur eftir § 13, stk. 2 og § 29, stk. 2 í lóg nr. 56 frá 15. mars 1967 um almenna forsorg við seinni broytingum. Grundupphæddin hjá persónum, ið fáa frádrátt sbrt. § 33, nr. 13, verður skattafrí árið eftir, at hesir eru fyltir 67 ár."

2) Sum nýggj § 33, nr. 13, verður sett: "Hjá persónum, sum fáa framskundaða fólkapensjón, avlamis- og einkjupensjón, og persónum, sum fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, ein pensjónistafrádráttur. Fyri giftar persónar er frádrátturin tann sami sum fólkapensjónsgrundupphæddin fyri giftar per-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 29, nr. 13, formuleres således: "alderstillæg efter § 10, personligt tillæg efter § 14, bistand, pleje- og invaliditetstillæg efter § 16 og grundbeløbet i henhold til § 3 for personer, der er fyldt 67 år efter lagtingslov nr. 58 af 15. marts 1967 om folkepension med senere ændringer, jfr. dog 2. punktum, invaliditetsydelser efter § 4, stk. 2, bistands- og plejetillæg efter § 11, personligt tillæg efter § 15, invaliditetsydelse, bistands- og plejetillæg efter § 16, ydelser efter §§ 9, 15, 16, 17 og 18 og personlige tillæg efter § 13, stk. 2 og § 29, stk. 2 i lov nr. 56 af 15. marts 1967 om offentlig forsorg med senere ændringer. Grundbeløbet for personer, der får fradrag i henhold til § 13, nr. 13 bliver skattefrit året efter, at disse er fyldt 67 år."

2) Som ny § 33, nr. 13) indsættes: "For personer, der får fremskyndet folkepension, invaliditets- og enkepension, og personer, der får bistand i henhold til § 13 i forsorgsloven, et pensionistfradrag. For gifte perrsoner er fradraget det samme som folkepensionsgrundbeløbet for gifte personer.

sónar. Fyri stakar persónar er frádráttur tann sami sum fólkapensjónsgrundupphæddin fyri stakar persónar. Til nýtslu í fyrisitingini av frádráttinum siga almannastovan og aðrir almennir myndugleikar eftir tørvi Toll og Skattstovu Føroya frá broytingum í fólkapensjónsgrundupphæddunum, og hvørjir persónar eru fevndir av 1. punktum. Frádráttur verður javnaður eftir grundupphæddini av fólkapensjónini pr. 1. oktober sum galdandi fyri komandi inntøkuár."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Lógin fær fyrstu ferð gildi fyri almanakkaárið 1994. Frádráttartølini fyri 1994 verða ásett í mun til galdandi skattareglur.

For enlige personer er det fradraget det samme som folkepensionsgrundbeløbet for enkelte personer. Til brug for administrationen af fradraget oplyser almannastovan og andre offentlige myndigheder efter behov "Toll- og Skattstova Føroya" om ændringer i folkepensionsgrundbeløbene, og hvilke personer, der omfattes af 1. punktum. Fradraget jævnes efter folkepensionens grundbeløb pr. 1. oktober som gældende for kommende indtægtsår."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.

Stk. 2. Loven får første gang virkning for kalenderåret 1994. Fradragsbeløbene for 1994 fastsættes ud fra gældende skattaregler.

Viðmerkingar:

Tá ið talan hevur verið um skatting av pensjónistum, so hevur politiska fráboðanin verið hon, at teir skulu gerast skattafrílir av pensjónsgrundupphæddini, og áður hava politisku flokkarnir á tingi mælt til hesa skipan, og fekk eitt tílíkt uppskot sum hetta 15 atkvøður, sum kortini ikki var nóg mikið til at fáa uppskotið samtykt.

Síðani tá hava vit havt val til Føroya Løgting, og skuldi uppskotið soleiðis, sum tað er orðað, havt møgulcika fyri at verið samtykt, serstakliga tá hugsað verður um, hvørjir flokkar tóku undir við uppskotinum tá.

Tí verður hildið rætt at koma við uppskotinum nú, um at pensjónistar verða skattafrílir av pensjónsgrundupphæddini, sum m.a. orsakað av hækkingini í kommunuskattaprosentinum hava verið trektir í skatti, sum í fleiri førum hevur tyngt munandi um fíggjarligu umstøðurnar hjá teimum.

Tingið hevur áður fingið frágreiðing um persónsfrádráttin hjá pensjónistum, tí ynski var um at taka spurningin um støðuna hjá teimum til viðgerðar.

Í útrokningunum, sum Toll- og Skattstova Føroya tá gjørdi, sæst, at í útrokningini var roknað við einum kommunuskattaprosenti upp á 21,5%, sum tá var roknað til at vera miðalprosent í landinum, og eftir teimum útrokningum, sum tá fyrilógu, skuldi persónsfrádráttur vera, um skatturin av grundupphæddini skal vera = 0: hjá giftum

kr. 7.878,00 og hjá ógiftum kr. 11.455,00. Ein minni broyting er hend síðani tá.

Henda skipanin, ið her verður skotin upp, førir við sær, at grundupphæddin gerst beinleiðis skattafrí, og merkir hetta, at landskassin og kommunurnar verða fyri inntøkumissi.

Hin vegin spara kommunurnar og landskasssin munandi upphæddir í sambandi við almannaveitingar, umframt at inntøkurnar bæði hjá landskassanum og kommununum eru øktar munandi í 1994 orsakað av "krígspensjónini", og hava hesi tiltøk givið almennu kassunum út við 55-60 mió. kr. bara í 1994.

Orsakirnar eru m.a. hesar:

1) øktur skattur av krígspensjón til land og kommunu,
2) Øktur skattur av vanligari fólkapensjón til land og kommunu,
3) minni útreiðslur av pensjónsviðbótum frá landi og kommunu,
4) undir 70 ár missa stóran part av pensjónini umframt aðrar viðbøtur.

Frá 1. januar 1994 lækkaðu peningastovnarnir útlánsrentuna, og fáa landskassin og kommunurnar fyrimun av lækkingini, og hildið verður ræti, at hetta kemur skattaborgarum landsins til góðar.

Sambært útrokningar, sum tá vórðu gjørdar, fáa landskassin og kommunurnar eina meirinntøku av, at peningastovnarnir lækkaðu rentuna upp á uml. 22 mió. kr., sum ikki er roknað við á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1994.

Meirinntøkur hjá landi og kommununum er sambært hetta:

Meirinntøkur av "krígspensjón" og minni útreiðslur til almannaveitingar	60 mió. kr.
Lækking av rentuni í peningastovnunum	22 mió. kr.
Í alt	82 mió. kr.

Hetta uppskotið er mett at kosta almennu kassunum 30 mió. kr.

Teir pensjónistar, sum eisini hava fingið hina sokallaðu "krígspensjónina", hava, sum áður sagt frá, mist allan rætt til viðbøtur og eykaviðbøtur, og hetta hevur ført við sær, at fyrimunurin, sum teir annars fingu av krígspensjónini, er avmarkaður munandi. Hetta er orsøkin til, at metti var rætt, at krígspensjónin ikki varð skattað við meira enn 25%.

Grundgevingin fyri, at royndir eiga at verða gjørdar at skatta krígspensjónina á annan hátt enn vanlig er, at hendan pensjón ikki er komin í gildi fyri føroyskar pensjónistar fyrr enn 20 - 25 ár aftan á aðrar partar í danska kongaríkinum, og tí hevur eisini verið hildið rætt at fremja eina serstaka skipan á hesum øki.

Í síni tíð fekk Føroya Løgting eina útrokning frá Toll- og Skattstovu Føroya, gjørd við

støði út frá hesum uppskotinum. Talan var um 9 pensjónistar frá ymsum plássum í landinum.

Sambært útrokningunum frá Toll- og Skattstovuni sum er hjálagt, er miðalskattaprosentið fyri tey fólkini, sum pensjónsgrundupphæddin og krígspensjónin er roknað út til at vera 33,71%, men uppskotsstillararnir hava havt til viðgerðar upplýsingar frá 222 pensjónistum, og er miðalskatturin væl hægri tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í 1994 enn útrokningin vísir.

Sambært somu útrokningum verður eftir, at pensjónsgrundupphæddin gerst skattafrí, og miðalskattaprosentið uml. 20% av øðrum inntøkum, t.v.s. at talan er um eina hampiliga stóra meðallækking, og er hetta eisini orsøkin til, at hildið verður óneyðugt at gera aðrar broytingar, tá talan er um aðrar inntøkur fyri pensjónistar.

Víst verður eisini til løgtingsmál nr. 46/1994: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

1. viðgerð 2. desember 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 17. februar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 10. november 1994 og aftaná fyrstu viðgerð tann 2. desember 1994 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Karl R. Johansen, Vilhelm Johannesen og Finnbogi Ísaksson) tekur ikki undir við uppskotinum, men vísir í staðin til løgtingsmál nr. 32/1994, har persónfrádrátturin hjá pensionistum varð hækkaður við kr. 800,- soleiðis, at ein stórur partur av pensionistum rinda ongan landsskatt, men bert skatt til kommununa av grundupphæddini í kommununum har skattaprosentið er størri enn 20.

Minnilutin Jørgin Niclasen tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 23. februar 1995. Málið fall við 7-0 atkvøðum.

46 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1994, hósdagin 10. november legði Jákup Olsen, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður gjørd hendan broyting:

§ 3 verður strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Lógin fær fyrstu ferð gildi fyri álmanakkaárið 1994. Frádráttartølini fyri 1994 verða ásett í mun til galdandi skattareglur.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændring:

§ 3 ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.

Stk. 2. Loven får første gang virkning for kalenderåret 1994. Fradragsbeløbene for 1994 fastsættes ud fra gældende skatteregler.

Viðmerkingar:

Hendan broytingin er ein náttúrlig broyting av løgtingsmáli nr. 45: Skattafrí pensjón, og víst verður til viðmerkingarnar í tí uppskotinum.

1. viðgerð 2. desember 1994. Málið var beint í skattanevndina, sum 17. februar 1994 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 10. november 1994 og aftaná fyrstu viðgerð tann 2. desember 1994 beint í skattanevndina.

Broytingaruppskotið er ein konsekvensbroyting til løgtingsmál nr. 45/1994: Skattafrí pensjón, og víst verður tí til hetta uppskotið.

2. viðgerð 23. februar 1995. Málið aftur tikið.

47 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing

Ár 1994, týsdagin 8. november legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 17 frá 10. mars 1992, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 22 frá 4. mars 1994, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Limir í arbeiðsloysistryggingini eru løntakarar, fiskimenn og útróðrarmenn, sum hava bústað í Føroyum, og sum eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, hava fylt 16 ár, men ikki fylt 67 ár, sum ikki fáa framskundaða fólkapensjón, ella varandi hjálp, ella fáa endurgjald fyri mista lønarinntøku og sum eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum."

2) § 1, stk. 3, litra c, verður orðað soleiðis:
"um tryggingargjaldið ikki er goldið

lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejdsløshedsforsikring og arbejdsanvisning.

§ 1.

I lagtingslov nr. 17 af 10. marts 1992, som senest ændret ved lagtingslov nr. 22 af 4. marts 1994, foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 1 affattes således:
"Medlemmer af arbejdsløshedsforsikringen er lønmodtagere, fiskere og hjemmefiskere, som bor på Færøerne, og er under fuld skattepligt på Færøerne, er fyldt 16 år, men ikke 67 år, som ikke oppebærer førtidig folkepension, eller varig hjælp, eller som får kompensation for tabt lønindtægt og er disponible på arbejdsmarkedet."

2) § 1, stk. 3, litra c, affattes således:
"når indbetaling til forsikringen ikke er sket inden en tidsfrist, fastsat af

innan eina freist, sum stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina ásetir."

3) Í § 2, stk. 2 verður "1. apríl 1996" broytt til: "1. april 1997".

4) § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Tryggingartakari rindar 2,75% í tryggingargjaldi av útgoldnari A-inntøku."

5) § 3, stk. 3 verður orðað soleiðis: "**Stk. 3.** Gjaldið, sum nevnt er í hesi grein, kann krevjast inn við panting."

6) § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Allir arbeiðsgevarar í Føroyum rinda 2,75% av hvørji A-lønarútgjalding til Arbeiðsloysistryggingina. Veitarar av endurgjaldi fyri mista lønarinntøku rinda 2,75% av hesum veitingum til Arbeiðsloysistryggingina."

7) § 6 verður orðað soleiðis: "**§ 6.** Í fíggjarárinum 1995 verða 50 mió. kr. avsettar á løgtingsins fíggjarlóg sum stuðul til tess at tryggja arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini gjaldføri."

8) § 8, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Tryggingartakari, sum er fevndur av § 1, stk. 1 og sum er tøkur á arbeiðsmarknaðinum, fær rætt til tryggingarútgjald, tá hann er vorðin limur í arbeiðsloysistryggingini."

9) § 8, stk. 4 verður orðað soleiðis: "**Stk. 4.** Tá tryggingartakari fer úr arbeiði í skúla ella læru, sum í mesta lagi varir 12 mánaðir, missir hann ikki vunna limatíð. Sama regla er galdandi, tá tryggingartakari, fer í vinnu uttanlands. Frammanfyri nevnda áseting er bert galdandi um so er, at arbeiðsloysistryggingin hevur fingið boð um hetta, áðrenn tryggingartakarin fer í skúla, í læru ella í vinnu uttanlands."

10) § 9 verður orðað soleiðis:

bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen."

3) I § 2, stk. 2 ændres "1. april 1996" til: "1. april 1997".

4) § 3, stk. 1 affattes således: "Forsikringstager indbetaler 2,75% i forsikringsindbetaling af udbetalt A-indkomst."

5) § 3, stk. 3 affattes således: "**Stk. 3.** Indbetalingen, der er nævnt i nærværende bestemmelse, kan indkræves ved udpantning."

6) § 4, stk. 1 affattes således: "Alle arbejdsgivere på Færøerne betaler 2,75% af hver A-løn udbetaling til arbejdsløshedsforsikringen. Ydere af erstatning for mistet lønindtægt betaler 2,75% af disse ydelser til arbejdsløshedsforsikringen."

7) § 6 affattes således: "**§ 6.** I finansåret 1995 bliver 50 mio. kr. afsat på lagtingets finanslov som støtte, for at sikre arbejdsløshedsforsikringens og arbejdsanvisningens likviditet."

8) § 8, stk. 1 affattes således: "Forsikringstager, der er omfattet af § 1, stk. 1 og er disponibel på arbejdsmarkedet, får ret til forsikringsudbetaling, når han er blevet medlem af arbejdsløshedsforsikringen."

9) § 8, stk. 4 affattes således: "**Stk. 4.** Når forsikringstager holder op med at arbejde og begynder skole eller lære, som højst varer i 12 måneder, taber han ikke forvunden medlemstid. Det samme er gældende, når forsikringstager kommer i arbejde udenlands. Forannævnte bestemmelser er kun gældende såfremt arbejdsløshedsforsikringen har fået meddelelse om dette, inden forsikringstageren begynder skolegang, lære eller arbejde udenlands."

"§ 9. Útgjaldingarupphæddin er í mesta lagi 70% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku íroknað frítíðarløn sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag."

11) § 11, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Útgjaldingarupphæddin pr. dag hjá løntakarum verður grundað á 70% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar, jbr. tó § 9, áðrenn arbeiðsloysið hjá tí tryggjaða verður staðfest sambært § 12 býtt við 252 døgum."

12) § 11, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 2.** Fyri tryggingartakarar har arbeiðsloysi var staðfest í tíðarskeiðinum frá 1. august 1992 fram til 7. november 1994 verður tryggingarútgjaldið útroknað eftir tí inntøkugrundarlagi, sum nýtt var av fyrstani tíð viðkomandi fekk rætt til útgjald."

13) § 11, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 4.** Hjá sjálvstøðugt vinnurekandi verður útgjaldingarupphæddin pr. dag grundað á 70% av meðalskattskyldugu inntøkuni tey seinastu 3 árini, áðrenn persónliga arbeiði hansara í virkinum er hildið uppat, jbr. tó § 9, býtt við 252 døgum."

14) § 11, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 5.** Hjá persónum, sum bæði eru sjálvstøðugt vinnurekandi og løntakarar, verður útgjaldingarupphæddin pr. dag grundað á 70% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar áðrenn arbeiðsloysi hjá tí tryggjaða verður staðfest sambært § 12, býtt við 252 døgum, og 70% av meðal skattskyldugu inntøkuni tey seinastu 3 árini, áðrenn persónliga arbeiði hansara í virkinum er hildið uppat, býtt við 252 døgum. Útgjaldingarupphæddin sambært hesi áseting má

10) § 9 affattes således:
"**§ 9.** Udbetalingsbeløbet er højst 70% af det beløb, som bliver udbetalt i henhold til den til enhver tid gældende overenskomst mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag for 40 timers arbejdsuge iberegnet feriepenge."

11) § 11, stk. 1 affattes således:
"Udbetalingsbeløbet pr. dag for forsikringstagere bliver beregnet som 70% af A-indkomsten de sidste 12 måneder, jfr. dog § 9, inden ledigheden hos den forsikrede bliver konstateret i henhold til § 12 delt med 252 dage."

12) § 11, stk. 2 affattes således:
"**Stk. 2.** For forsikringstagere, der har fået ledigheden konstateret i tidsrummet fra 1. august 1992 til 7. november 1994, bliver forsikringsudbetalingen beregnet efter det indtægtsgrundlag, som blev benyttet i den første tid, vedkommende fik ret til udbetaling."

13) § 11, stk. 4 affattes således:
"**Stk. 4.** For selvstændige erhvervsdrivende bliver udbetalingsbeløbet pr. dag beregnet som 70% af den gennemsnitlige skattepligtige indkomst de sidste 3 år, inden hans personlige arbejde i virksomheden er ophørt, jfr. dog § 9, delt med 252 dage."

14) § 11, stk. 5 affattes således:
"**Stk. 5.** For personer, der både er selvstændigt erhvervsdrivende og lønmodtagere bliver udbetalingsbeløbet pr. dag beregnet som 70% af A-indtægten de sidste 12 måneder siden ledigheden hos den forsikrede bliver konstateret i henhold til § 12, delt med 252 dage, og 70% af den gennemsnitlige skattepligtige indkomst de sidste 3 år, inden hans personlige arbejde i virksomheden er

saman við møguligari aðrari lønarinntøku/skattskyldugum avlopi av vinnuvirki tó ongantíð fara upp um 70% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku íroknað frítíðarløn sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag."

15) § 11, stk. 4 verður hereftir stk. 6 og soljóðandi:

"**Stk. 6.** Hjá persónum, sum fáa avlamispensjón, men sum partvís eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum, verður útgjaldingarupphæddin pr. dag grundað á í mesta lagi 70% av A-inntøkuni, sum ikki stavar frá avlamispensjónini, teir 12 seinastu mánaðirnar áðrenn arbeiðsloysið hjá tí tryggjaða verður staðfest sambært § 12, býtt við 252 døgum. Útgjaldingarupphæddin má saman við avlamispensjónini ikki fara upp um ta í stk. 5 nevndu útgjaldingarupphædd."

16) § 11, stk. 5 og 6 verða hereftir § 11, stk. 7 og 8.

17) Aftaná § 12 a verður sett:

"**§ 12 b.** Fyri arbeiði, sum arbeiðsloysisskipanin ávísir uttanlands, kann stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina áseta nærri reglur um, at skipanin rindar fíggjarligan stuðul til ferðakostnað.

Stk. 2. Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina kann áseta nærri reglur um at persónar, sum arbeiða uttanlands ella umborð á altjóða skrásettum skipi og sum annars ikki hava møguleika at vera arbeiðsloysistryggjaðir í Føroyum ella uttanlands, eftir egnum ynski kunnu vera limir í arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini."

18) Aftaná § 12 b verður sett:

"**§ 12 c.** Stýrið fyri arbeiðsloysis-

ophørt, delt med 252 dage. Det således fastsatte udbetalingsbeløb må tillige med øvrige lønindtægter/-skattepligtigt overskud af erhvervsvirksomhed dog aldrig overstige 70% af det beløb, som bliver udbetalt for 40 timers arbejdsuge, medregnet ferieløn i henhold til den til enhver tid gældende overenskomst mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag."

15) § 11, stk. 4 bliver herefter stk. 6 og affattes således:

"**Stk. 6.** For personer, der oppebærer invalidepension, men som delvis er til disposition for arbejdsmarkedet bliver udbetalingsbeløbet pr. dag baseret på højst 70% af A-indtægten, som ikke er invalidepension, de seneste 12 måneder inden ledigheden hos den forsikrede bliver konstateret i henhold til § 12, delt med 252 dage. Udbetalingsbeløbet må sammen med invalidepension ikke overstige det i stk. 5 nævnte udbetalingsbeløb."

16) § 11, stk. 5 og 6 bliver herefter § 11, stk. 7 og 8.

17) Efter § 12 a indsættes:

"**§ 12 b.** For arbejde, som arbejdsløshedsordningen anviser i udenlandet, kan bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætte nærmere regler om, at ordningen giver økonomisk støtte til rejseudgifter.

Stk. 2. Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen kan fastsætte nærmere regler om, at personer, som arbejder udenlands eller ombord på internationalt registrerede skibe og som ellers ikke har mulighed at være arbejdsløshedsforsikret på Færøerne eller i udlandet, efter anmodning kan blive medlemmer af arbejdsløshedsforsikringen

tryggingina og arbeiðsávísingina kann áseta nærri reglur um veiting frá arbeiðsloysistryggingini til fólk í farloyvi frá einum føstum starvi.

Stk. 2. Veiting undir farloyvi kann verða givin fyri eitt ávíst tíðarskeið millum 3 og 6 mánaðir.

Stk. 3. Veiting undir farloyvi eigur at verða givin við tí treyt, at annað fólk, sum er tøkt í arbeiðsávísingini, verður sett í staðin í sama tíðarskeið og undir somu treytum.

Stk. 4. Reglurnar, sum ásettar verða eftir hesi grein, skulu góðkennast av landsstýrinum."

19) § 14 verður orðað soleiðis:

"**§ 14.** Rætturin til tryggingarútgjald fellur burtur, tá tryggingartakari í undanfarna 3 ára skeiði hevur fingið útgjald í 546 dagar, ella flytir av landinum.

Stk. 2. Landsstýrið kann við kunngerð eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina áseta tíðarskeiðið ein kann fáa tryggingarútgjald upp til 830 dagar í einum 5 ára skeiði."

20) § 15 a verður strikað.

21) § 16, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"**Stk. 3.** Útreiðslur av umsitingini av arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini verða tíggjaðar burtur av gjøldum, sum nevnd eru í 2. kapitli."

22) § 17, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Avgerðir, sum arbeiðsloysistryggingin og arbeiðsávísingin hevur tikið um arbeiðsávísing, tryggingarútgjald, tryggingarinngjald, limaskap og afturgjalding av ov nógv útgoldnari trygging, kunnu kærast til kærunevndina hjá arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Avgerðir hjá kærunevndini kunnu ikki kærast til

og arbejdsanvisningen."

18) Efter § 12 b indsættes:

"**§ 12 c.** Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen kan fastsætte nærmere regler om ydelse fra arbejdsløshedsforsikringen til personer med orlov fra et fast arbejde.

Stk. 2. Ydelse under orlov kan gives for et bestemt tidsrum mellem 3 og 6 måneder.

Stk. 3. Ydelse under orlov skal gives på den betingelse, at en anden person, der er ledig i arbejdsanvisningen, ansættes i stedet i samme tidsrum og på samme betingelser.

Stk. 4. Regler, der fastsættes efter nærværende bestemmelse, skal godkendes af landsstyret."

19) § 14 affattes således:

"**§ 14.** Retten til forsikringsudbetaling bortfalder, når forsikringstager i den foregående 3 års periode har modtaget udbetaling i 546 dage, eller flytter til udlandet.

Stk. 2. Landsstyret kan med bekendtgørelse efter indhentet udtalelse fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætte perioden, man kan få forsikringsudbetaling op til 830 dage i en 5 års periode."

20) § 15 a udgår.

21) § 16, stk. 3 affattes således:

"**Stk. 3.** Udgifter i forbindelse med administrationen af arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen financieres af de indbetalinger, som er nævnt i kapitel 2."

22) § 17, stk. 1 affattes således:

"Beslutninger, som arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen har truffet angående arbejdsanvisning, forsikringsudbetaling, forsikringsindbetaling, medlemskab og tilbagebetaling af for meget udbetalt

annan fyrisitingarligan myndugleika."

23) § 18, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Avgreiðslustovan umsitur arbeiðsávísingina sambært § 16."

forsikring, kan ankes til ankenævnet for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen inden 4 uger efter, at vedkommende har fået besked om afgørelsen. Ankenævnets afgørelser kan ikke ankes til anden administrativ myndighed."

23) § 18, stk. 1 affattes således: "Arbejdsanvisningen bliver administreret af ekspeditionskontoret i henhold til § 16."

§ 2.

Honda lóg fær gildi 7. november 1994. §§ 12 b og 12 c fáa tó gildi 1. februar 1995.

Stk. 2. Tryggingartakarar, sum hava miist rættin til tryggingarútgjald vegna daga avmarkingina, sum var galdandi í lógini, áðrenn henda lógarbroyting kom í gildi, fáa rætt til tryggingarútgjald frá 7. november 1994 at rokna, tað, ið eftir er av útgjaldingartíðarskeiðinum sambært § 14.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 7. november 1994. §§ 12 b og 12 c træder dog i kraft 1. februar 1995.

Stk. 2. Forsikringstagere, der har tabt retten til forsikringsudbetaling på grund af dagebegrænsningen, som var gældende i loven, forinden denne lovændring trådte i kraft, opnår ret til forsikringsudbetaling fra 7. november 1994 at regne i den periode, der er tilbage af udbetalingsperioden i henhold til § 14.

Viðmerkingar.

Í samgonguskjalinum hjá verandi samgongu verður sagt um arbeiðsloysisskipanina:

> "Ásannandi at arbeiðsloysið er ein samfelagstrupulleiki hevur samgongan sett sær fyri beinanvegin at styrkja arbeiðsloysistryggingina. Neyðugt er eisini saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at endurskoða alla arbeiðsloysisskipanina, sum tó framvegis verður ein tryggingarskipan. Verður arbeiðsloysið størri enn tað, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru mentir at fíggja, átekur tað almenna sær at rinda neyðugu eykaútreiðslurnar av skipanini."

Í hesum sambandi hevur samgongan eisini avtalað, at ALS skal fáa 50 mió. kr. á fíggjarlógini fyri 1995. Aftrat hesum er ætlanin at útvega skipanini lán uppá 45 mió. kr.

Eisini hevur samgongan avrátt, at tær mest neyðugu broytingarnar í ALS skulu fremjast frá november í ár. Aftrat hesum skal skipanin sum so endurskoðast, og henda endurskoðan skal verða framd í 1995.

Ætlanin var annars, at lógin skuldi fáa gildi 1. november í ár, men av tekniskum orsøkum verður gildiskoman flutt til 7. november. Reglurnar í §§ 12 b og 12 c fáa tó gildi 1. februar 1995 sum ætlað.

Í fyriliggjandi uppskoti eru tær broytingar í skipanini, sum eiga at verða gjørdar sum skjótast. Her er fyrst og fremst talan um tær broytingar, sum samgongan er sanid um. Men talan er eisini um broytingar, sum stýrið fyri ALS hevur mælt til, og sum annars eisini vóru skotnar upp av undanfarnu samgongu. Tað uppskotið datt burtur í samband við at nýval varð útskrivað.

Høvuðsbroytingarnar eru fylgjandi:

Hækking av útgjaldinum.
Tá skipanin byrjaði at virka, var útgjaldið sett til 70% av inntøkugrundarlagnum. Hetta varð lækkað til 67% í 1993, tá skipanini restaði gjaldføri. Men nú er ætlanin at hækka útgjaldið til tað, sum tað var upprunaliga.

Rullandi útgjaldið fellur burtur.
Ein týðandi broyting er, at rullandi útgjaldið fellur burtur. Her er talan um eina rættiliga broyting. Ætlaða skipanin inniber, at tann arbeiðsleysi í prinsippinum fær fult útgjald alla tíðina hann er í skipanini.

Royndirnar hava víst, at skipanin við "rullandi útgjaldi" er rættiliga óheppin. Henda skipanin merkir jú, at hvørt útgjald verður lægri enn tað undanfarna. Og hetta er serstakliga óheppið í eini støðu við nógvum arbeiðsleysum, sum kunnu rokna við at vera longri tíð í skipanini.

Longt tíðarskeið í skipanini.
Sambært galdandi reglum falla fólk úr skipanini, tá tey hava verið í henni í 2 ár. Hesi hava so bert forsorgarskipanina at líta á. Ætlanin er nú at leingja tíðarskeiðið, sum fólk kunnu vera í skipanini. Hetta lógaruppskot gevur møguleikar fyri, at tey, sum komu inn í skipanina 1. august 1992, tá ALS byrjaði at gjalda út, kunnu verða verandi í skipanini til árslok 1995. Tá eigur hesin partur av skipanini kortini at verða endurskoðaður.

Hetta fer m.a. at merkja, at tey, sum fóru úr skipanini 1. august 1994, tá tey høvdu verið 2 ár í henni, koma inn aftur frá 7. november. Hetta merkir, at hesi ikki fáa endurgjald fyri ta tíðina, tey hava verið burtur úr skipanini.

Annars verður roknað við, at ALS sjálv er før fyri at líggja kostnaðin av hesi broyting í skipanini restina av hesum fíggjarárinum, t.v.s. november og desember.

Tær fyrr umtalaðu 95 mió. kr. skulu so nýtast at fíggja broytingarnar í 1995. Hvussu langt inn í 1995 henda upphædd kann fíggja hesar broytingar, valdast fyrst og fremst gongdina í arbeiðsloysinum, og tað ber ikki til at gera nakrar eftirfarandi metingar av hesum fyrr enn vit nærkast ársskiftinum. Ein heilt avgerandi spurningur í hesum sambandi er, hvussu nógv og hvussu skjótt arbeiðsskapandi politikkurin hjá landsstýrinum fer at ávirka tørvin hjá ALS. Tey tiltøk, sum landsstýrið hevur í huga í hesum sambandi, skulu koma at virka frá ársskiftinum, og tí má roknast við, at hesi tiltøk koma at ávirka tørvin hjá ALS longu í 1995. Samlaða tíðarskeiðið í skipanini áseti landsstýrið í kunngerð eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og

arbeiðsávísingina.

Annars eru aðrar smærri broytingar og her verður vist til viðmerkingarnar til tær einstøku greinirnar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

ad. 1) Veitingar, sum eru endurgjald fyri mista lønarinntøku, verða roknaðar sum arbeiðsloysistryggjað inntøka og fólk, ið hava slíkar inntøkur, verða nú limir eisini í tíðarskeiðunum, har tey bert hava slíkar inntøkur. Hetta eru veitingar fyri t.d. lønarmiss frá eitt nú Almannastovuni og Føroya Vanlukkutrygging. Fyri at fáa útgjald, er tað tó ein treyt, at ein er tøkur á arbeiðsmarknaðinum.

Einkjupensjónistar verða ikki longur undantiknir møguleikanum fyri og kravinum um limaskap; men hetta merkir tó ikki, at sjálv einkjupensjónin er at meta sum arbeiðsloysistryggjað inntøka. Arbeiðsloysistryggjað inntøka er øll løn, og allar veitingar, sum eru endurgjald fyri mista lønarinntøku hjá limunum í tryggingini. Limir í tryggingini eru allir pensjónsmóttakarar, ið ikki beinleiðis eru undantiknir í § 1. Pensjón verður ikki roknað sum arbeiðsloysistryggjað inntøka.

Tey, ið eru fyribils óarbeiðsfør (sjúkradagpeninga- og barnsburðardagpeningamóttakarar), varðveita limaskapin í tryggingini, eisini fyri ta tíð, tey fáa slíkar veitingar.

ad. 2) Í galdandi lóg er einki nevnt um nakra freist í sambandi við inngjald.

Skotið verður upp, at stýrið ásetur inngjaldingarfreistina.

ad. 3) Lánið úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum verður útsett í 1 ár.

ad. 4) Broytingin í § 3, stk. 1 er komin av tí, at endurgjald fyri mista løtarinntøku nú eisini verður roknað sum arbeiðsloysistryggjað inntøka. Vist verður í hesum sambandi til pkt. 1.

ad. 5) Teknisk broyting.

ad. 6) Vist verður til pkt. 4.

ad. 7) Á fíggjarlógini fyri komandi ár verða játtaðar 50 mió. kr. sum stuðul til tess at tryggja Arbeiðsloysisskipanini gjaldføri.

ad. 8) Vist verður til pkt. 1.

ad. 9) Reglurnar í § 8, stk. 4 um farloyvisskipanina verða broyttar soleiðis, at øll nú kunnu nýta tær, og ikki sum higartil. einans tey, ið eru sjálvstøðugt vinnurekandi. Harnæst er tíðarskeiðið avmarkað til í mesta lagi

12 mánaðir.

ad. 10) Reglan um at landsstýrið skal áseta útgjaldingarupphæddina, sum í mesta lagi kann verða 70% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku, verður broytt soleiðis, at útgjaldingarupphæddin verður sett til í mesta lagi 70%, uttan at landsstýrið kann lækka sjálvan prosentsatsin. Í løtuni er útgjaldingarupphæddin 67%.

ad. 11) Sambært hesi reglu verður útgjaldingarupphæddin grundað á 70% av A-inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar áðrenn arbeiðsloysið hjá tí tryggjaða verður staðfest. Hetta merkir, at rullandi útgjaldið fellur burtur.

ad. 12) Skotið verður upp at broyta reglurnar soleiðis, at tey, sum eru rakt av tí rullandi útgjaldinum, fáa tryggingarútgjaldið útroknað eftir tí upprunaliga inntøkugrundarlagnum frá 7. november í ár at rokna. Tó verður ikki talan um nakra kompensatión fyri tíðina, sum farin er.

ad. 13) og 14) Hesar báðar reglurnar eru um tryggingarútgjaldið hjá teimum, sum eru sjálvstøðugt vinnurekandi og teimum, sum bæði eru sjálvstøðugt vinnurekandi og A-løntakarar. Víst verður í hesum sambandi til pkt. 10, 11, 12 og 13.

ad. 15) Persónar, sum fáa avlamispensjón og sum eru partvís tøkir á arbeiðsmarknaðinum, hava ræti til tryggingarútgjald fyri tann partin av inntøkuni, sum stavar frá arbeiði. Útgjaldið má saman við avlamispensjónini ongantíð vera hægri enn 70% av 40 tíma arbeiðsviku.

ad. 17) Í § 12 b, stk. 1 verður givið stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina heimild at áseta nærri reglur um, at skiparin rindar fíggjarligan stuðul til ferðakostnað fyri arbeiði, sum arbeiðsloysisskipanin ávísir uttanlands.

Í stk. 2 verður skotið upp, at reglur kunnu gerast um, at fólk, sum arbeiða uttanlands ella umborð á altjóða skrásettum skipum, fáa høvi at gerast limir í arbeiðsloysistryggingini. Treytin er, at hesir persónar ikki hava møguleika at verða tryggjaðir í Føroyum ella uttanlands. Hendan serskipan er sjálvboðin, og skal tryggingartakarin sjálvur gjalda eina upphædd, svarandi til hana, sum nevnd er í § 3, stk. 1.

ad. 18) Greinin gevur stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina heimild til at seta nærri reglur um veiting frá Arbeiðsloysisskipanini til fólk, ið fara í farloyvi úr einum føstum starvi. Veitingin undir farloyvinum skal virka útreiðsluneutral fyri skipanina. Landsstýrið skal góðkenna hesar reglur.

ad. 19) Skotið verður upp, at dagatalið ein kann fáa arbeiðsloysistrygging, verður økt upp í 546 dagar í einum 3 ára skeiði. 546 dagar svara til arbeiðsdagarnar í 2 ár og 2 mánaðir.

Í § 14, stk. 2 verður skotið upp, at landsstýrið við kunngerð eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina kann áseta tíðarskeiðið ein kann fáa tryggingarútgjald upp til 830 dagar í einum tíðarskeiði uppá 5 ár. 830 dagar svara umleið til arbeiðsdagarnar í 3½ ári.

ad. 20) Av tí at landsstýrið sambært § 6 í hesum uppskoti fer beinleiðis inn at fíggja Arbeiðsloysisskipanina við stuðli á løgtingsins fíggjarlóg, verður skotið upp at strika § 15 a.

ad. 21) Tekniskar og málsligar broytingar.

ad. 22) Sambæri galdandi lóg kunnu avgerðir um tryggingarútgjald og arbeiðsávísing kærast til kærunevndina hjá arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini. Skotið verður upp at broyta § 17, stk. 1 soleiðis, at møguleiki eisini verður fyri at kæra avgerðir um tryggingarinngjald, limaskap og avgerðir um afturgjalding av ov nógv útgoldnari arbeiðsloysistrygging.

ad. 23) Tekniskar og málsligar broytingar.

ad. § 2, stk. 1 Skotið verður upp, at lógin fær gildi frá 7. november 1994. Tó verður skotið upp at seta § 12 b og § 12 c í gildi frá 1. februar 1995, soleiðis at ALS fær stundir at gera neyðugar fyrireikingar.

ad. § 2, stk. 2 Í juli mánaði í ár byrjaðu fólk at fara úr skipanini vegna dagaavmarkingina. Skotið verður upp, at hesi fáa rætt til tryggingargjald frá 7. november í ár at rokna, og tað, ið eftir er av útgjaldingartíðarskeiðinum. Tó verður eingin kompensatión givin fyri tíðarskeiðið, frá tí tey fóru úr skipanini fram til 7. november.

1. viðgerð 10. november 1994. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 22. november 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 8. november og varð eftir fyrstu viðgerð tann 10. november beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við Óla Jacobsen, landsstýrismann í arbeiðaramálum, stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina (ALS), og umboð fyri felag teirra arbeiðstøku (FTA).

Landsstýrismaðurin í arbeiðaramálum førdi fram, at spurningurin viðvíkjandi karensdøgum er ein trupulleiki. Sambært galdandi reglum fær arbeiðstakari, ið tekur upp arbeiði av sær sjálvum, karantenu. Verður arbeiðið harafturímóti ávíst gjøgnum ALS, fær arbeiðstakarin ikki karantenu.

Avleiðingarnar av hesum eru m.a., at hugurin til at leita upp arbeiði verður tikin frá einum, og at hetta kann elva til misnýtslu av skipanini.

Stýrið fyri arbeiðisloysisskipanina (ALS) tekur undir við broytingunum í uppskotinum um, at útgjaldið, ið nú er 67% av inntøkugrundarlagnum, verður hækkað til 70 % sum tað var upprunaliga. Eisini tekur stýrið undir við broytingunum í uppskotinum um, at tey, ið eru fallin burturúr skipanini, koma uppí aftur skipanina, og at tað rullandi útgjaldið verður avtikið.

Stýrið metir tað ikki vera neyðugt at gera aðrar broytingar í lógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing á hesum sinni, og mælir til, at aðrar broytingar verða gjørdar í sambandi við endurskoðanina av lógini í 1995.

Stýrið leggur dent á, at í sambandi við, at útgjaldið verð sett úr 70 % niður á 67% og at landsstýrið nú setur 50 mió. av á fíggjarlógini, verður tryggingarelementið tikið úr skipanini, soleiðis, at frá at vera ein tryggingarskipan verður skipanin broytt til at verða ein trygdarskipan.

Eisini metir stýrið, at í uppskotinum hjá landsstýrinum er ov nógv, ið gongur ímóti meginregluni í lógini um, at stýrið fyri ALS umsitur og hevur ábyrgdina av skipanini.

Umboðini fyri felag teirra arbeiðstøku (FTA) førdu fram, at arbeiðsloysisstuðul kann vera annað enn peningur. Til dømis er sambandið við arbeiðsmarknaðin týðningarmikið, og eigur hetta at koma fram í uppskotinum t.d. við einari farloyvsskipan.
Umboðini førdu fram, at reglan um farloyvi í uppskoti landsstýrisins eigur at verða broytt soleiðis, at landsstýrið hevur skyldu til at gera eina farloyvisskipan. Harumframt framførdu umboðini, at reglan í uppskotinum um, at farloyvi kann veitast úr 3 - 6 mánaðum eigur at verða broytt soleiðis, at farloyvi kann veitast úr 3 - 12 mánaðum.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin, (Atli Hansen, Ingeborg Vinther, Vilhelm Johannesen og Heini O. Heinesen) metir, á sama hátt sum landsstýrið, at uppskotið um at rullandi útgjaldið verður tikið úr skipanini, at tíðin sum fólk kunnu vera í skipanini verður longd, og at útgjaldingarprosentið verður hækkað frá 67% til 70% loysir nakrar av teimum mest átrokandi trupulleikunum á arbeiðsloysisøkinum.

Meirilutin í nevndini metir harumfram, at tað er óheppið, at arbeiðsgevarar rinda gjald fyri løn til fólk, ið ikki eru húsett í Føroyum, undir FAS skipanini. Hesi fólk hava ikki rætt til útgjald av tí at tey ikki búgva í Føroyum, smbr § 1 í lógini.

Viðvíkjandi farloyvisskipanini metir meirilutin, at landsstýrið, saman við stýrinum fyri ALS, beinanvegin eigur at fáa regluna um farloyvisskipan setta í verk.

Í uppskoti landsstýrisins er ásett, at landsstýrið kann við kunngerð eftir ummæli frá stýrinum fyri ALS áseta tíðarskeiðið ein kann fáa tryggingarútgjald upp til 830 dagar í einum 5 ára skeiði. Meirilutin metir, at orðið ummæli eigur at verða broytt til tilmæli, tí tað eigur at verða stýrið fyri ALS, ið tekur stig til eina sovorðna broyting.

Meirilutin metir, at reglurnar viðvíkjandi karensdøgum fyri arbeiði, ið varir styttri enn 1 viku skulu verða tær somu, óansað um arbeiði er ávíst gjøgnum ALS ella um tryggingartakarin sjálvur leitar sær upp arbeiði.

Út frá hesum setir ein meiriluti (Atli Hansen, Ingeborg Vinther, Vilhelm Johannesen og Heini O. Heinisen) í nevndini fram soljóðandi broytingaruppskot til landsstýrisins uppskot um broyting av løgtingslóg um arbeiðisloysistrygging og arbeiðsávísing:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Pkt. 6 verður orðað soleiðis:
"§ 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
Allir arbeiðsgevarar í Føroyum rinda 2,75% av hvørji A- lønarútgjalding til Arbeiðstryggingina. Veitarar av endurgjaldi fyri mista lønarinntøku rinda 2,75% av hesum veitingum til Arbeiðsloysistryggingina. Arbeiðsgevarar rinda ikki gjald fyri løn hjá útlendingum undir FAS skipanini."

2) Pkt.18 verður orðað soleiðis:
"Aftaná § 12b verður sett:
§ 12 c. Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina ásetir nærri reglur um veiting frá arbeiðsloysistryggingini til fólk í farloyvi frá einum føstum starvi.

1) Pkt. 6 affattes således:
§ 4 stk. 1 affattes således:
"Alle arbejdsgivere på Færøerne betaler 2,75% af hver A-løn udbetaling til arbejdsløshedsforsikringen. Ydere af erstatning for mistet lønindtægt betaler 2,75% af disse ydelser til arbejdsløshedsforsikringen. Arbejdsgivere betaler ikke forsikringspræmie af løn hos udlændinge under FAS ordningen."

2) Pkt. 18 affattes således:
" Efter § 12 b indsættes:
§ 12 c. Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætter nærmere regler om ydelse fra arbejdsløshedsforsikringen til personer med orlov fra et fast arbejde.

Stk. 2. Veiting undir farloyvi kann verða givin fyri eitt ávíst tíðarskeið millum 3 og 12 mánaðir.
Stk 3. Veiting undir farloyvi skal verða givin við tí treyt, at annað fólk, sum er tøkt í arbeiðsávísingini, verður sett í staðin í sama tíðarskeið og undir somu treytum.
Stk 4. Reglurnar, sum ásettar verða eftir hesi grein, skulu góðkennast av landsstýrinum."

Stk. 2. Ydelse under orlov kan gives for et bestemt tidsrum mellem 3 og 12 måneder.
Stk. 3. Ydelse under orlov skal gives på den betingelse, at en anden person, der er ledig i arbejdsanvisningen, ansættes i stedet i samme tidsrum og på samme betingelser.
Stk. 4. Regler, der fastsættes efter nærværende bestemmelse, skal godkendes af landsstyret."

Meirilutin í nevndini er samdur um, at tær broytingar, ið nú verða gjørdar, bert er ein fyribils loysn, og er samd við landsstýrismanninum í arbeiðaramálum um, at lógin eigur at verða endurskoðað. Meirilutin heldur at hetta eigur at verða gjørt skjótast gjørligt, og setur tí fram soljóðandi:

U p p s k o t

til

samtyktar

"Landsstýrinum verður álagt at skipa so fyri, at lógin um arbeiðisloysistrygging og arbeiðsávísing verður endurskoðað í so góðari tíð, at lógaruppskot kann verða lagt fyri løgtingið og viðgjørt í verandi tingsetu."

Minnilutin, (Jenis av Rana) mælir til at taka undir við uppskoti landsstýrisins við niðanfyri standandi broytingum:

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Pkt. 7 verður orðað soleiðis:
"§ 6 verður orðað soleiðis: "Í komandi fíggjarárum verður neyðugur stuðul avsettur á løgtingsins fíggjarlóg, til tess at tryggja arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini gjaldføri".

2) Pkt 10 verður orðað soleiðis:
"§ 9 verður orðað soleiðis:
§ 9. Útgjaldingarupphæddin er í mesta lagi 90% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku íroknað frítíðarløn sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála milium Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag."

3) Pkt. 11 verður orðað soleiðis:
§ 11, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Útgjaldingarupphæddin pr. dag hjá løntakarum verður grundað á 90% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar, jbr. tó § 9, áðrenn arbeiðsloysið hjá tí tryggjaða verður staðfest sambært § 12 býtt við 252 døgum."

4) Pkt. 13 verður orðað soleiðis:
"§ 11 stk. 4 verður orðað soleiðis:
Stk. 4. Hjá sjálvstøðugt vinnurekandi verður útgjaldingarupphæddin pr. dag grundað á 90% av meðalskattskyldugu inntøkuni tey seinastu 3 árini, áðrenn persónliga arbeiði hansara í virkinum er hildið uppat, jbr. tó § 9, býtt við 252 døgum."

5) Pkt. 14 verður orðað soleiðis:
"§ 11, stk. 5 verður orðað soleiðis:

1) Pkt. 7 affattes således:
"§ 6 affattes således:
"I de kommende finansår tilvejebringes nødvendige midler på finansloven med henblik på at sikre arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen likviditet."

2) Pkt. 10 affattes således:
§ 9 affattes således:
"§ 9 Udbetalingsbeløbet er højst 90% af det beløb, som bliver udbetalt i henhold til den til enhver tid gældende overenskomst mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag for 40 timers arbejdsuge iberegnet feriepenge."

3) Pkt. 11 affattes således:
"§ 11, stk. 1 affattes således:
Udbetalingsbeløbet pr. dag for forsikringstagere bliver beregnet som 90% af A-indkomsten de sidste 12 måneder, jfr. dog § 9, inden ledigheden hos den forsikrede bliver konstateret i henhold til § 12 delt med 252 dage."

4) Pkt. 13 affattes således:
"§ 11 stk. 4 affattes således:
Stk. 4. For selvstændige erhvervsdrivende bliver udbetalingsbeløbet pr. dag beregnet som 90% af den gennemsnitlige skattepligtige indkomst de sidste 3 år, inden hans personlige arbejde i virksomheden er ophørt, jfr. dog § 9, delt med 252 dage."

5) Pkt. 14 affattes således:
"§ 11, stk. 5 affattes således:

Stk. 5 Hjá persónum, sum bæði eru sjálvstøðugt vinnurekandi og løntakarar, verður útgjaldingarupphæddin pr. dag grundað á 90% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysið hjá tí tryggjaða verður staðfest sambært § 12, býtt við 252 døgum, og 90% av meðal skattskyldugu inntøkuni tey seinastu 3 árini, áðrenn persónliga arbeiði hansara í virkinum er hildið uppat, býtt við 252 døgum. Útgjaldingarupphæddin sambært hesi áseting má saman við møguligari aðrari lønarinntøku/skattskyldugum avlopi av vinnuvirki tó ongantíð fara upp um 90% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku íroknað frítíðarløn sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

6) Pkt. 15 verður orðað soleiðis:
§ 11, stk. 4 verður hereftir stk. 6 og soljóðandi:
"Stk. 6. Hjá persónum, sum fáa avlamispensjón, men sum partvís eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum, verður útgjaldingarupphæddin pr. dag grundað á í mesta lagi 90% av A-inntøkuni, sum ikki stavar frá frá avlamispensjónini, teir 12 seinastu mánaðirnar áðrenn arbeiðsloysið hjá tí tryggjaða verður staðfest sambært § 12, býtt við 252 døgum. Útgjaldingarupphæddin má saman við avlamispensjónini ikki fara upp um ta í stk. 5 nevndu útgjaldingarupphædd."

7) Pkt. 18 verður orðað soleiðis:
"Aftaná § 12 b verður sett § 12 c. Fólk í føstum starvi og tímalønt kunnu fara í farloyvi. Í farloyvistíðini hava fólk rætt til farloyvisveiting. Farloyvið er treytað av, at fólk, ið er tøkt í arbeiðsávísingini verður sett í staðin.

Stk 5. For personer, der både er selvstændigt erhvervsdrivende og lønmodtagere bliver udbetaligsbeløbet pr. dag beregnet som 90% af A-indtægten de sidste 12 måneder siden ledigheden hos den forsikrede bliver konstateret i henhold til § 12, delt med 252 dage, og 90% af den gennemsnitlige skattepligtige indkomst de sidste 3 år, inden hans personlige arbejde i virksomheden er ophørt, delt med 252 dage. Det således fastsatte udbetalingsbeløb må tillige med øvrige lønindtægter/skattepligtigt overskud af erhvervsvirksomhed dog aldrig overstige 90% af det beløb, som bliver udbetalt for 40 timers arbejdsuge, medregnet ferieløn i henhold til den til enhver til gældende overenskomst mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag."

6) Pkt. 15 affattes således:
"§ 11, stk. 4 bliver herefter stk. 6 og affattes således:
Stk. 6. For personer, der oppebærer invalidepension, men som delvis er til disposition for arbejdsmarkedet, bliver udbetalingsbeløbet pr. dag baseret på højst 90% af A-indtægten, som ikke er invalidepension, de seneste 12 måneder inden ledigheden hos den forsikrede bliver konstateret i henhold til § 12, delt med 252 dage. Udbetalingsbeløbet må sammen med invalidepension ikke overstige det i stk. 5 nævnte udbetalingsbeløb."

7) Pkt 18 affattes således:
"Efter § 12b indsættes:
§ 12 c : Personer med fast arbejde og timelønnede kan få orlov. I orlovsperioden er personer berettigede til orlovsydelse. Orloven er betinget af, at personer, der er ledige i arbejdsanvisningen, ansættes i stedet.

Stk. 2. Útgjaldingarupphæddin verður ásett sambært §§ 9 og 11, stk. 1.

Stk. 3.
a) Veiting undir farloyvi kann verða givin fyri eitt ávist tíðarskeið millum 3 og 12 mánaðir.
b) Tímalønt kunnu fara í farloyvi 4. hvørja viku, við rætti til farloyvisveiting.
c) Fólk, ið arbeiða fulla tíð, kunnu fara í farloyvi svarandi til ½ tíð. Útgjaldingarupphæddin verður ásett til ½ av tí, ið ásett er sambært §§ 9 og 11, stk. 1.

§ 14 verður strikað.

Stk. 2. Forsikringsudbetalingen ansættes i henhold til §§ 9 og 11, stk. 1.

Stk. 3.
a) Ydelse under orlov kan gives for en bestemt periode mellem 3 og 6 måneder.
b) Timelønnede personer få orlov hver 4. uge med ret til orlovsydelse.
c) Personer, der er fuldtidsbeskæftigede kan få orlov svarende til ½ tid. Forsikringsudbetalingen ansættes til ½ af beløbet, som er fastsat i henhold til §§ 9 og 11, stk. 1."

§ 14 udgår.

Minnilutin (Jenis av Rana) setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður Føroya Landsstýri at seta nevnd at endurskoða núverandi løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, og at áleggja nevndini at leggja úrslitið av arbeiði sínum fyri løgtingið áðrenn 1. apríl 1995.

Viðmerkingar

Uppskotið snýr seg um at bøta um viðurskifti teirra arbeiðsleysu. Millum hesar ábøtur eru nevndar reglur fyri farloyvisskipan, ein skipan, sum fram um aðrar ábøtur vil kunna viðføra at arbeiðsleys koma í arbeiði aftur. Júst hetta má verða aðaltáðttur okkara, at skapa arbeiðspláss til arbeiðsleysu okkara.

Av mongu fylgjunum kreppan hevur fört við sær, rakar tað at verða vorðin arbeiðsleysur cína meinast. Fíggjarliga grundarlagið ridlar, bústaðurin, ið skuldi verða tryggi karmurin um familjuna, gerst lættliga marra teirra, hvør nýggjur dagur ber við sær stúranina um nóg mikið verður til matna og klæðir og dagligu skyldumar annars.

Nøkur hava í sær styrkina at standa ímóti, søkja nýggjar leiðir, hyggja upp um fjøllini og berja seg ígjøgnum. Men hesi eru tey fáu. Hjá teimum mongu gerst arbeiðsloysi steinurin, sum fær tey at hókna undir byrðuni, tey gevast á fótum og mong teirra rýma

í vónloysi.

Ein av fremstu uppgávum politikaranna er at skapa verju og trygd fyri hesi.

Tað er so dánt, at tey verða nevnd í skjalinum, sum liggur eftir Danmarkarferð samgongunnar - hesi arbe: eysu, sum eru og, um enn væl skuldi gingið, hóast alt verða verandi eina tíð frar ir.

At taka tey, sum út eru gridin, innaftur í skipanina, er sjálvsagt og átti at verið gjørt áðrenn nakar av teimum kom út fyri hesari vanærandi vanlagnu. At rullandi útgjaldið nakrantíð sá dagsins ljós er ein stórur skamblettur fyri tjóð okkara.

Men hóast nýggja uppskot landsstýrisins, verða tey flestu hótt við at glíða út aftur úr skipanini um fáar mánaðir og uppskotið tryggjar ongum framhaldandi hjálp frá skipanini so leingi tey eru uttan arbeiði, men letur óvissuna um hvussu leingi tey kunna verða í skipanini, hanga sum eina hóttan yvir høvdi teirra.

Ynskja politikararnir at seta eitt áramál inn í skipanina, so átti tað at verið eitt áramál fyri nær samfelagið tryggjaði tí arbeiðsleysa arbeiði alfur, og ikki ein hóttan um at verða blakaður út úr skipanini aftur.

Tí uppskotið frá minnilutanum um at taka áramálið burtur úr lógini.

Síðani minniliga oktobur dagin í 1992 hava danskir myndugleikar við jarnhond stýrt føroyska samfelagnum. Fyri at bjarga egnum áhugamálum hava teir lagt byrðar á vanliga føroyingin, byrðar, sum hesin í flestu førðum ikki átti at borið. Meta danir tað vera sjálvsagt at leggja byrðar á vanliga føroyingin, átti tað at verið eins sjálvsagt fyri teir at tryggja sama føroyinginum og familju og húski hansara somu trygd, sum teir (danir) veita egnu borgarum sínum tá hesi koma í kreppu. Danin, ið gerst arbeiðsleysur, fær útgjald upp til 90% av einari arbeiðsmannaløn, meðan vanligi føroyingurin eftir uppskotinum fær 70%.

Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at 70% av einari arbeiðsmannaløn er hámarkið og tað svarar til ca. kr. 9.100,- um mánaðin, men tey flestu fáa munandi minni (og hetta verður so sjáldan fört fram), tí tey fáa jú 70% grundað á egnu A inntøkuna seinastu 12 mðr. áðrenn arbeiðsloysið byrjaði og tað gevur í flestu førðum mangan minni enn kr. 9.100,- um mánaðin.

Eitt útgjald uppá 90% merkir, at arbeiðleysi føroyingurin hevur tryggjað sær sama útgjaldið, sum danski staturin hevði givið honum, um hann flýddi úr Føroyum "niður" til teirra.

Annars hevur nevndararbeiðið sannført minnilutan um, at lógin er út fmóti ónýtilig, og tí eigur at verða endurskoðað beinanvegin.

Tað undrar alsamt, at ein skipan viðv. farloyvi enn ikki er sett í verk. Framum aðrar

ábøtur vil slík skipan opna fyri møguleikum teirra arbeiðsleysu at sleppa til arbeiðis aftur, og vil harvið lætta um tunga arbeiðsloysisokið hjá summum, ið hvussu so er fyribils. Tí verður álagt landsstýrinum beinanvegin at seta slíka í verk. Her eiga teoretiskir spurningar um skipanin er ein tryggingar- ella trygdarskipan ikki at fáa loyvi at forða. Støða teirra arbeiðsleysu er akut, talan er um svára neyð, og í slíkum føri mega vit gloyma tað teoretiska, í hvussu so er fyribils, og taka tøk saman, teimum líðandi til hjálpar.

Miðflokkurin hevur áður vísl á tað vanbýti føroyskum útróðrarmonnum er fyri, har hesir gjalda inn á líka føti við onnur, men tá ið á stendur, eru avskornir frá at fáa útgjald úr skipanini á líka føti.

Tí setir minnilutin (Jenis av Rana) fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

"Álagt verður Føroya Landsstýri, áðrenn 1. januar 1995 at greiða viðurskifti útróðrarmansins í arbeiðsloysisskipanini, soleiðis at hesin kemur undir somu útgjaldingarsømdir sum aðrir arbeiðsleysir borgarar.

2. viðgerð 24. november 1994. Uppskot landsstýrisins við broytingum frá meirilutanum í nevndini samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskot meirilutans til samtyktar samtykt við 19-0 atkvøðum. Broytingaruppskot minnilutans fall við 2-0 atkvøðum. Uppskot minnilutans til samtyktar fullu við ávikavist 4-0 og 6-0 atkvøðum.

Millum 2. og 3. viðgerð 24. november 1994 legði meirilutin í nevndini fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð

Meirilutin í nevndini (Atli Hansen, Ingeborg Vinther, Vilhelm Johannesen, og Heini O. Heinesen) setur fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

1) Pkt. 1 verður orðað soleiðis:
"§ 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Limir í arbeiðsloysistryggingini eru løntakarar, fiskimenn, útróðramenn, og persónar sum fáa endurgjald fyri mista lønarinntøku, sum hava bústað og eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, sum hava fylt 16 ár, men ikki fylt 67 ár, sum ikki fáa framskundaða fólkapensión, ella varandi hjálp, og sum eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum."

2) Sum nýtt pkt. 19 verður sett:
"§ 13 verður orðað soleiðis:
Verður arbeiði til tryggingartakaran ávíst av arbeiðsávísingini, ella leitar tryggingartakarin sær sjálvur upp arbeiði, ið varir í mesta lagi 1 viku, verða bíðidagarnir í § 12 ikki taldir við í útrokningina av tryggingarútgjaldinum. Har, ið tryggingartakarin sjálvur hevur leitað sær upp arbeiði áliggur tað bæði tryggingartakaranum og arbeiðsgevaranum skylda at boða arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini frá í seinasta lagi sama dag sum arbeiðið verður tikið upp. "
Stk. 2. Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina kann á sama hátt sum í stk. 1 áseta nærri reglur um, at bíðidagarnir í § 12 ikki skulu telja við í útrokningini av tryggingarútgjaldi, um so er, at fiskimaður fær arbeiði umborð á føroyskum fiskifari, sum varir í mesta lagi ávíst dagatal, sum stýrið ásetir."

3) Pkt 19 verður broytt til Pkt. 20 og verður soljóðandi:
"§ 14 verður orðað soleiðis:
§ 14. Rætturin til tryggingarútgjald fellur burtur, tá tryggingartakari í undanfarna 3 ára skeiði hevur fingið útgjald í 546 dagar, ella flytir av landinum.
Stk. 2. Landsstýrið kann við kunngerð

I) Pkt. 1 affattes således:
"§ 1, stk. 1 affattes således:
"Medlemmer af arbejdsløshedsforsikringen er lønmodtagere, fiskere, hjemmefiskere, og personer som modtager erstatning for tabt arbejdsfortjeneste, som bor og er under fuld skattepligt på Færøerne, som er fyldt 16 år, men ikke 67 år, som ikke oppebærer førtidig folkepension, eller varig hjælp, og som er disponible på arbejdsmarkedet."

2) Som nyt pkt. 19 indsættes:
"§ 13 affattes således:
Anvises arbejde til forsikringstageren af arbejdsanvisningen, eller optager forsikringstageren selv arbejde, af en varighed af højst en uge, medregnes ventepenge i § 12 ikke med i udregningen af forsikringsudbetaling. Der hvor forsikringstageren selv optager arbejde, påviler det både forsikringstageren og arbejdsgiveren at underrette arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen, senest samme dag som arbejdet optages."
Stk. 2. Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen kan fastsætte nærmere regler om at ventedagene i henhold til § 12 ikke skal medregnes i udregningen af forsikringsudbetalingen, hvis en fisker får arbejde ombord på et færøsk fiskefartøj, som højst varer et bestemt antal dage, fastsat af bestyrelsen."

3) Pkt. 19 ændres til Pkt 20 og bliver sålydende:
"§ 14 affattes således:
§ 14. Retten til forsikringsudbetaling bortfalder, når forsikringstager i den foregående 3 års periode har modtaget udbetaling i 546 dage, eller flytter til udlandet.

eftir tilmæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina áseta tíðarskeiðið ein kann fáa tryggingarútgjald upp til 830 dagar í einum 5 ára skeiði."

4) Pkt. 20, 21, 22 og 23 verða broytt til Pkt. 21, 22, 23 og 24.

Stk. 2. Landsstyret kan med bekendtørelse efter indhentet udtalelse fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætte perioden, man kan få forsikringsudbetaling op til 830 dage i en 5 års periode."

4) Pkt. 20, 21, 22 og 23 ændres til Pkt. 21, 22, 23 og 24.

3. viðgerð 24. november 1994. Broytingaruppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

Lóg nr. 114 frá 25. november 1994.

FL jnr. 1335-3/91.

48 ILO-konventión nr. 169 um upprunafólk og ættarfólk í sjálvstøðugum statum

Ár 1994 týsdagin 8. november legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at Føroyar taka undir við, at Danmark uttan fyrivarni fyri Føroyar góðkennir konventión nr. 169 viðvíkjandi upprunafólki og ættarfólki, sum samtykt varð á altjóða arbeiðsráðstevnuni í Geneve í 1989.

Viðmerkingar:

Við skrivi dagfest 12. oktober 1994 hevur ríkisumboðið, vísandi til skriv frá arbeiðsmálaráðnum dagfest 10. oktober 1994 heitt á landsstýrið um at geva ummæli av ILO-konventión nr. 169 um upprunafólk og ættarfólk í sjálvstøðugum statum.

Endamálið við konventiónini er at miða ímóti at tryggja virðing fyri vanliga lívsháttin hjá upprunafólki, harumframt sosialu, mentanarligu, átrúnaðarligu og andaligu virði teirra.

Upprunafólkið í Grønlandi, inuit, er fevnt av artikkul 1 í konventiónini. Sostatt koma teir 44 artiklarnir í konventiónini at hava týdning fyri Grønland.

Meginparturin av teimum viðurskiftum, sum verða umrødd í konventiónini, eru sambært lóg nr. 137 frá 23. mars 1948 um føroyska heimastýrið, føroysk sermál. Tá tað ikki eru upprunafólk og ættarfólk í Føroyum, kann Danmark góðkenna konventiónina uttan fyrivarni fyri Føroyar.

Fyri Føroya viðkomandi hevur konventiónin sostatt ongan týdning.

Ein donsk góðkenning av konventiónini kann fremjast, uttan at neyðugt verður við lógarbroytingum.

Sambært viðmerkingunum til málið er danska stjórnin av teirri fatan, at ávísar skyldur, sum Danmark átekur sær við eini góðkenning av konventión nr. 169, sambært § 19 í grundlógini er av "størri týdningi" og skal tí leggjast fyri fólkatingið.

Sambært upplýsingum frá ríkisumboðnum, verður støðutakan til ILO-konventiónir sum meginregla tikin av stjórnini og ikki av fólkatinginum.

Í Føroyum er tað hinvegin siðvenja at leggja mál um altjóða sáttmálar fyri løgtingið.

Mælt verður løgtinginum til at taka undir við at Danmark góðkennir konventión nr. 169 um upprunafólk og ættarfólk í sjálvstøðugum statum uttan fyrivarni fyri Føroyar og at løgtingið einki hevur at viðmerkja til viðmerkingarnar í málinum til uppskotið um fólkatingssamtykt.

Annars verður víst til skriv frá ríkisumboðnum dagfest 12. oktober 1994, skriv frá arbeiðsmálaráðnum dagfest 10. oktober 1994 og uppskot til fólkatingssamtykt við viðmerkingum.

Málið hevur skund vegna tess, at tað kemur til viðgerðar á stjórnarfundi 29. november 1994.

1. viðgerð 10. november 1994. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 29. november 1994 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 8. november 1994 og eftir 1. viðgerð 10. november beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið um ILO konventión nr. 169 um upprunafólk og ættarfólk í sjálvstøðugum statum. Av tí at konventiónin ikki viðvíkur viðurskiftum í Føroyum og av tí, at grønlendska heimastýrið hevur heitt á donsku stjórnina um at taka undir við konventiónini, hevur marknaðarnevndin ongar viðmerkingar, og mælir **ein samd marknaðarnevnd** løgtinginum til at taka undir við uppskotinum til samtyktar, ið er soljóðandi:

"Løgtingið góðkennir, at Føroyar taka undir við, at Danmark uttan fyrivarni fyri Føroyar góðkennir konventión nr. 169 viðvíkjandi upprunafólki og ættarfólki, sum samtykt á altjóða arbeiðsráðsstevnu í Geneve í 1989."

2. viðgerð 2. desember 1994. Málið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

49 Demokratisering á fjølmiðlaøkinum

Ár 1994, týsdagin 8. november legði Jenis av Rana, løgtingsmaður, vegna miðflokkin, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at heita á landsstýrið um at seta í verk eina demokratisering á fjølmiðlaøkinum, har

1) **einkarrættur Útvarp- og Sjónvarp Føroya verður tikin av,**
2) **loyvi verður givið til nærútvarp og nærsjónvarp, og**
3) **møguleikar verða at keypa avlopstíð á verandi sendinetum, sum ÚF og SvF brúka í dag.**

Viðmerkingar:

Á vári 1990 setti Føroya landsstýri eina nevnd at kanna lóggávuna um útvarp og sjónvarp. Fátt av evnunum, sum landsstýrið heitti á nevndina um at viðgera, var **spurningurin um stovnan av nærvarpi út frá teimum umsóknum, sum landsstýrið hevði fingið.**

Á heysti 1989 hevði landsstýrið fingið fyrstu umsóknina um loyvi til at senda nærvarp.

Í juli 1991 leggur nevndin - útvarps- og sjónvarpslóggávunevndin - fram álit í málinum, og um spurningin um nærvarp verður m.a. sagt:

> "Semja er í nevndini um, at tað skal vera loyvt at senda nærútvarp og nærsjónvarp við teirri grundgeving, at hetta fer at styrkja talifrælsið og við hesum eisini fólkaræðið.
>
> Mælt verður til at byrja við einari 2 ára royndartíð.
>
> Nærvarpingin eigur at verða skipað á tann hátt, at sent kann vera á egnum sendineti til eitt geografiskt avmarkað øki (økisnærvarp). Harumframt eigur tað eisini at verða skipað so fyri, at tað skal verða møguligt at keypa avlopstíð á verandi sendinetum, sum ÚF og SvF brúka í dag, fyri kostpris (áhugavarp).

Mælt verður til, at landsstýrið skal geva loyvi til at senda nærvarp og frammanfyri nevnda áhugavarp á sendinetunum, sum ÚlF og SvF brúka."

Sí annars bjálagda fotoavrit úr drúgva álitinum.

Havandi í huga orð nevndarinnar um, at **hetta fer at styrkja talifrælsið og við hesum eisini fólkaræðið"**, at tey lond, vit vanliga velja framum at verða samanborin við, fyri árum síðani hava tikið av einkarrættin, og nú hava eitt blómandi virksemi á hesum øki, og at áhugin fyri nærvarpi enn er stórur her á landi, verður hjálagda uppskot til samtyktar lagt fyri Føroya Løgting.

Viðmerkjast skal, at her er ikki talan um nakra eykaútreiðslu fyri føroyska samfelagið - heldur tvørturímóti.

1. viðgerð 23. november 1994. Málið var beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 22. november legði fram saljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av Miðflokkinum tann 8. november 1994 og eftir 1. viðgerð 23. november 1994 beint í mentannar- og skúla nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fundir við ávikavist stjóran fyri Sjónvarp Føroya, Árna Gregersen, og stjóran fyri Útvarp Føroya, Jógvan Jespersen.

Hesir greiddu nevndini frá viðurskiftunum og førdu m.a. fram, at í Føroyum eru bæði sjónvarp og útvarp í veruleikanum nærvørp.

Báðir stovnarnir gjørdu á fundi við mentannar- og skúlanevndina vart við, at inntøkurnar eru minkaðar. Teir mæltu báðir til, at nýggj lóggáva og reglugerð verða tilevnaðar, tí verandi lógir og reglur eru ikki tíðarhóskandi.

Nevndin tekur ikki undir við uppskoti Miðfloksins til samtyktar, men ásannar, at neyðugt er við broyttari ella dagførdari lóggávu á fjølmiðlaøkinum og setir tí **ein sand mentannar- og skúlanevnd** fram soljóðandi

u p p s k o t

t i l

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at halda fram við arbeiðnum, ið byrjaði í 1990, at gera nýggja lóggávu og at leggja fyri løgtingið uppskot um nýggja lóggávu og reglugerð fyri Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya.

2. viðgerð 9. mars 1995. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 29-0 atkvøðum. Uppruna uppskotið fall við 11-0 atkvøðum.

50 Sjúkraflutningur úr Nólsoynni

Ár 1994, týsdagin 8. november legði Jenis av Rana, løgtingsmaður, vegna miðflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at heitt verður á landsstýrið um at sett verður á figgjarlógina fyri 1995 tann upphædd, ið krevst til nøktandi tilkalliskipan fyri manningina á Rituni (ella tað strandfaraskip, sum til einahvørja tíð røkir sambandið millum Tórshavn og Nólsoy), so hesir á tryggan hátt kunnu røkja neyðugar sjúkraflutningar frá Nólsoynni.

Viðmerkingar:

So nær og tó! Solciðis kann av sonnum sigast um nólsoyingar, sum hvat fjarstøðu viðvíkir kunnu fegnast um at vera so nær staddir meginsjúkrahúsi okkara, sum væl til ber, tá tú ikki býrt á sjálvari Streymoynni, men fyri at kunna hava fullgóða njóting av trygd landssjúkrahúsins, tá ið á stendur, krevst skjótur og tryggur sjúkraflutningur. Ein slíkan hava nólsoyingar ikki hevur víst seg, tá ið á hevur staðið.

"Ritan", strandfaraskipið, sum í løtuni røkir rutuna til Nólsoyar, hevur ikki vaktartilkalliskipan fyri manning sína, og tí fáa hesir ikki, sum sjálvsagt var, veitt nólsoyingum kønu hjálp sína, tá á stendur.

Í staðin fyri hava vælmeinandi menn valt at lata annað strandfaraskip við legu á Gomlurætt røkja hesa tænastu. Sparing sigst vera orsøkin, men av nólsoyingum verður prísurin tíverri longu hildin at hava verið ov høgur.

Flestu, sum hava kunnleika til hesi viðurskifti, eru samd við nólsoyingum; ótryggleiki nólsoyinga og beinleiðis kostnaðurin verður lætt ov høgur prísur at gjalda fyri hesa á pappírið komnu sparing.

Rættast hevði tí verið av lóggevandi valdinum at lært av mistøkum, bundið um heilan fingur og veitt nólsoyingum ta sjálvsøgdu trygdina, sum ein tilkallivaktarskipan til manningina á "Rituni" hevði givið.

Leggjast skal aftrat, at henda skipan eisini hevði givð íbúgvunum í Hesti eina eykatrygd.

1. viðgerð 24. november 1994. Málið var beint í almanna og heilsunevndina, sum 18. apríl 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið varð lagt fram av Miðflokkinum tann 8. november 1994 og varð aftaná fyrstu viðgerð, tann 24. november 1994, beint í almanna- og heilsunevndina.

Almanna- og Heilsunevndin hevur viðgjørt málið, og hevur í hesum sambandi havt fund við landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum og sjúkrahússtjóran.

Málið snýr seg partvís um sjúkraflutning úr Nólsoy, og partvís um at fáa læknahjálp út til Nólsoyar.

Sjúkrakassarnar eiga at rinda fyri at fáa bráfeingis læknahjálp til Nólsoyar, meðan landskassin rindar fyri vanliga sjúkraflutningin. Upprunaliga røkti "Reyðikrossur," ið sjúkrahúsið átti, sjúkraflutningin til Nólsoyar, uttan at sjúkrakassin rindaði fyri hetta.

Sjúkrahússtjórin hevur greitt nevndini frá, at tað eru umleið 6 ferðir um árið, at nólsoyingar hava brúk fyri bráfeingis læknahjálp. Ein tilkallivakt hjá Rituni fer at kosta umleið 40.000 um mánaðin. Haraftrat koma so kr. 5.000,- hvørja ferð Ritan siglir til Nólsoyar. Tilsamans verður kostnaðurin fyri eina tilkallivakt hjá Ritini umleið 510.000,- um árið.

Sjúkrahússtjórin mælti til at kanna um tað ber til, at portørarnir á sjúkrahúsinum kunnu røkja læknaflutningin til Nólsoyar, tá ið tað er brúk fyri bráfeingis læknahjálp. Um hetta letur seg gera, er neyðugt at gera eina avtalu millum ambulansutænastuna og sjúkrakassan um gjald fyri flutningin.

Viðvíkjandi sjálvum sjúkraflutninginum greiddi sjúkrahússtjórin frá, at hesin ikki er verri nú Tróndur røkir rutuna enn áður.

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur greitt nevndini frá, at landsstýrið metir, at læknaflutningurin til Nólsoyar ikki er nøktandi í løtuni, og at landsstýrið er sinnað at taka stig til at bøta um skipanina.

Nevndin metir ikki, at málið er búgvið til at gera av hvussu skipanin við læknaflutningi til Nólsoyar skal verða, og tí metir nevndin tað vera skeivt at áleggja landsstýrinum eina útreiðslu, áðrenn málið hevur fingið neyðuga viðgerð. Nevndin tekur tí ikki undir við uppskoti Miðfloksins til samtyktar um sjúkraflutning úr Nólsoynni. Harafturímóti heldur nevndin, at tað er rætt at kanna hvussu ein bráfeingis hjálparskipan kann/eigur at skipast, og setir tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at gera eina nøktandi bráfeingis hjálparskipan við læknahjálp til Nólsoyar.

2. viðgerð 20. apríl 1995. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 23-0 atkvøðum. Upprunauppskotið fall við 7-0 atkvøðum.

51 Broyting í løgtingslóg um rentuskatt

Ár 1994 týsdagin 8. november legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um rentuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 5. juni 1992 við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:
"**§ 1.** Rentan, sum føroyskir peningastovnar og postgiro geva av innistandandi peningi, herundir ábyrgdarpeningi í føroyskum sparikassum og renta av føroyskum lánsbrøvum smbr. § 25, nr. 3, litra b í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, verður skattað eftir reglunum í hesi lóg."
2) Í § 2, stk. 3 verður "18%" broytt til: "35%".
3) Í § 3, stk. 1 verður "22%" broytt til: "35%".
4) Í § 3 b, stk. 1 verður "1. februar" broytt til: "15. februar".
5) Sum § 5 verður sett:
"**§ 5.** Ásetingarnar í §§ 3 og 4 eru eisini galdandi fyri rentu av føroyskum lánsbrøvum smbr. § 1.
Stk. 2. Renta av føroyskum lánsbrøvum verður skattað við 35% p.a. Tann, sum rindar eigaranum rentuna av lánsbrøvunum, skal halda eftir 35% av rentuni sum rentuskattur og avrokna rentuskattin til landskassan eftir ásetingunum í § 3."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om renteskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 5. juni 1992 om renteskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1 affattes således:
"**§ 1.** Rente, som færøske pengeinstitutter og postgiro yder af indskud, herunder garantiindskud i færøske sparekasser, og rente af færøske obligationer, jfr. § 25, nr. 3, litra b i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat, beskattes efter reglerne i denne lov."
2) I § 2, stk. 3 ændres "18%" til: "35%".
3) I § 3, stk. 1 ændres "22%" til: "35%".
4) I § 3 b, stk. 1, ændres "1. februar" til: "15. februar".
5) Som § 5 indsættes:
"**§ 5.** Bestemmelserne i §§ 3 og 4 er også gældende for rente af færøske obligationer, jfr. § 1.
Stk. 2. Rente af færøske obligationer beskattes med 35%. Den, der udbetaler ejerne renterne af obligationerne, skal efterholde 35% af renten som renteskat og afregne renteskatten til landskassen efter bestemmelserne i § 3."

§ 2.
Henda lóg fær gildi 1. januar 1995.

§ 2.
Denne lov træder i kraft 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Felags viðmerkingar til uppskot til broyting av skatta-, rentu- og virðisbrævaskattalógini í samband við lánsbrævaupptøku.

Fylgjandi uppskot landsstýrisins um broytingar í løgtingslógunum um rentuskatt, skattalógini og virðisbrævaskattalógini viðgera øll spurningin um skatting av føroyskum lánsbrøvum.

Í avtaluni við donsku stjórnina frá 12. oktober 1993 varð staðfest, at landsstýrið sjálvt við lántøku í Føroyum ella á danska kapitalmarknaðinum skal fíggja eitt møguligt hall á fíggjarlógini fyri 1994. Í hesum sambandi hevur Landsbanki Føroya fyrireikað lánsbrævaupptøku.

Í fyrireikingunum hevur verið miðað ímóti, at skattligu viðurskiftini hjá føroysku lánsbrøvunum vera neutral mótvegis teimum føroysku peningastovnunum, soleiðis at skattligu viðurskiftini ikki avlaga fríu kappingina um innlánini frá borgarunum v.m. Landsstýrið ynskir tí við framlagda uppskotinum at tryggja, at lánsbrøvini verða skattað á sama hátt, sum innlánini í peningastovnunum, t.v.s. at bæði rentan og kursvinningur verða skattað við sama prosentsatsi, sum innlán í bankaum og sparikøssum. Fyri at røkka hesum endamáli er neyðugt við broytingum í rentuskattalógini, skattalógini og virðisbrævaskattalógini.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

ad 1: § 1 í rentuskattalógini, sum eftir galdandi reglum fevnir um rentur av innistandandi í føroyskum peningastovnum og postgiro, verður broytt soleiðis, at avgjaldsskyldan eisini fevnir um rentur av lánsbrøvum sambært § 25, nr. 3, litra b í skattalógini, t.v.s. um rentu av lánsbrøvum, sum sambært nevndu reglum verða definerað sum føroysk lánsbrøv. Avgjaldsskyldug eftir lógini um rentuskatt eru bert persónar og deyðsbúgv, sum eru undir fullari skattskyldu í Føroyum sambært § 1 í skattalógini.

ad 2 og 3: Galdandi avgjaldssatsir uppá ávikavist 18% og 22% av rentum av útlendskum virðisbrøvum og rentum av innistandandi í Føroyum verða her hækkaðar til 35%.

ad 4: Innlatingarfreistirnar fyri avgjaldsuppgerðirnar verða her broyttar frá 1. februar til 15. februar, og kemst hetta av umsitingarligum grundum umfram fyri at avgjaldsskyldug kunnu lata uppgerð fyri avgjald eftir § 2, stk. 3 fyri ávikavist innistandandi í útlandinum og útlendsk virðisbrøv inn í eini uppgerð.

ad 5: Nýggj § 5 verður sett í gildi, sum fyriskrivar, at sama mannagongd, sum er

galdandi fyri uppkrevjing av rentuskatti, skal eisini nýtast, tá rentuskattur verður kravdur av rentum av føroyskum lánsbrøvum. Hetta merkir, at tá landskassin skal útgjalda rentuágóða til eigarar av lánsbrøvum, skal møguligur rentuskattur eftirhaldast samsvarandi reglunum í rentuskattalógini.

1. viðgerð 10. november 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 29. november legði fram soljóðandi

F e l a g s á t i t

í

løgtingsmáli nr. 51/94: Broyting í løgtingslóg um rentuskatt,
løgtingsmáli nr. 52/94: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.
og løgtingsmáli nr. 53/94: Broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum.

Málini vórðu løgd fram av landsstýrinum tann 8. november 1994 og eftir 1. viðgerð 10. november vórðu øll trý beind í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málini og hevur havt fund við Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í skattamálum, og umboð fyri Landsbankan og Toll- og Skattstovuna.

Umframt hetta eru løgtingslimir kunnaðir um hesi málini, sum í høvuðsheitum snúgva seg um útgávu av lánsbrøvum og skatting av teimum.

Undir viðgerðini segði Sigurd Poulsen, at 29. november er avgjørt seinasta freist at boða frá, at lánsbrøvini verða givin út í hesum árinum. Tí er neyðugt, at lógarbroytingarnar eru samtyktar og kunngjørdar fyri ta tíð.

Ætlanin hevur verið, at lánsbrøvini skulu vera skattafrí, men at fíggjarognaravgjald skuldi latast av vinninginum, men peningastovnarnir halda tað vera rættari, at lánsbrøvini verða skattað sum innistandandi í føroyskum peningastovnum.

Lánsbrøvini hava 2 ára lánstíð. Rentan verður ásett eftir fastlánsrentu, og síðani verður nakað lagt omaná. Rentan verður serliga høg í fyrstani. Roknað verður við, at 2,25% verða løgd omaná. Sum rentustøðið er í løtuni, hevði effektiva rentan av lánsbrøvum verið stívliga 9%.

Uppá fyrispurning upplýsti hann, at lánsbrøvini verða givin út, tí føroyingar hava bundið seg til bert at taka lán í Føroyum og í Danmark og ikki økja um landskassans skuld við vanligari lántøku. Verandi lán skulu í staðin niðurgjaldast. Skipanin í Europa er soleiðis nú, at t.d. statskassin tekur ikki lán frá Tjóðbankanum ella vanligum bankum. Bankarnir eru fáir nú, tí so nógvir eru lagdir saman, og sambandið millum myndugleikarnar og bankarnar er tí bert politiskt. IMF-serfrøðingarnir mæltu eisini til at geva út lánsbrøv.

Somuleiðis segði hann upp á fyrispurning, at peningastovnarnir eru skeptiskir, tí ov stórt útboð av lánsbrøvum kann noyða teir at hækka rentuna, og hetta verður ikki hildið at vera gagnligt. Men vandin fyri hesum er ikki stórur, tí landskassanum fer ikki at tørva so nógvan pening tey komandi árini - í mesta lagi eina mia. kr. við árslok 1997. Bankin og sparikassarnir eiga í løtuni umí. 2,5 mia. kr. í útlendskum virðisbrøvum, og tað er væl meira, enn banka- og sparikassalógin krevur.

Bankin og sparikassarnir eru varnir við at keypa lánsbrøv, men kortini verður roknað við at selja mest í Føroyum. Tað er tó ikki sørt, at áhugi er fyri lánsbrøvum í Danmark.

Løgtingið hevur givið Landsbankanum heimild at geva út lánsbrøv fyri 180 milj. kr. Haraftrat er tann almenna skuldin niðurgoldin, og samlaða lánsheimildin er tí 300 mió. kr.

Gjaldførið hjá landskassanum er gott, og tað má vera ríkiligt, tí landskassin skal altíð vera føtur fyri at gjalda fallin lánsbrøv aftur, áðrenn nýggj verða útgivin.

Hóast javnvág fæst á fíggjarlógina - ætlandi í 1998 - verður neyðugt framhaldandi at geva út lánsbrøv, tí almennir stovnar, m.a. Húsalánsgrunnurin, hava brúk fyri peningi til at afturgjalda skuld. Hetta kann fíggjast við, at landskassin gevur út lánsbrøv og lænir stovnunum pening.

Upp á fyrispurning segði stjórin fyri Landsbanka Føroya, Sigurd Poulsen, at orsakað av, at handlar við lánsbrøvum skulu noterast á Københavns Fondsbørs fyri at kunna roknast sum umsetilig lánsbrøv og á tann hátt kunnu roknast sum ein partur av gjaldførinum hjá peningastovnunum, er tað neyðugt, at tey verða skrásett á V.P. (Virðisbrævamiðstøðini).

Petur Alberg Lamhauge gjørdi vart við, at Virðisbrævamiðstøðin kann ikki afturhalda skatt av lánsbrøvum, so sum landsstýrið hevur skotið upp í løgtingsmáli nr. 51/1994. Tí verður neyðugt at viðgera vinningin av øllum lánsbrøvum sum B-skatt, og hetta fer at økja um arbeiðsbyrðuna hjá Toll- og Skattstovuni.

Upplýst varð, at um fløga í tílík lánsbrøv verður vanligt millum fólk, kemur hetta at skapa munandi eyka umsiting, orsakað av, at avkastið, rentur og kursvinningur skal takast við á sjálvuppgávuni, og rokning fyri avgjaldið skal á hesum grundarlagi sendast tí einstaka borgaranum. Ikki minst fær gjaldstovan eyka arbeiði við at krevja peningin inn.

Landsbankin kannar møguleikan fyri, at avgjaldið framyvir kann samtíðarskattast hjá V.P.

Undir 1. viðgerð varð spurningurin reistur, um tað ikki var talan um eina dupultskatting av peningastovunum.

Nevndin hevur spurt seg fyri hjá Toll- og Skattstovu Føroya og hevur fingið hetta svar:

"Talan er ikki um eina dupultskatting. Í § 2, stk. 1 og 2 í rentuskattalógini er ásett, hvør hevur skyldu at gjalda rentuskatt, og er orðingin soljóðandi:
"§ 2. Skyldu at gjalda rentuskatt eftir hesi lóg hava líkamligir persónar og deyðsbúgv, sum hava rætt til tær rentuinntøkur, sum eru nevndar í § 1 í hesi lóg, og sum eru undir skatuskyldu eftir § 1 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.
Stk. 2. Eisini hava Føroya Lívstrygging, Tryggingarsambandið Føroyar og allar deildir tess, Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur og Færøernes Realkreditinstitut skyldu at rinda rentuskatt eftir hesi lóg.""

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen og Finnbogi Ísakson) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum broytingum:

B r o y t í n g a r u p p s k o t

§ 1, nr. 5 verður orðað soleiðis:

5) Sum § 5 verður sett:
"Áseting̊arnar í §§ 3 og 4 eru eisini galdandi fyri rentu av føroyskum lánsbrøvum smbr. § 1.
Stk. 2. Renta av føroyskum lánsbrøvum verður skattað við 35% p.a.
Stk. 3. Renta skal gevast upp til skattingar á sjálvuppgávuni fyri viðkomandi ár eftir reglunum í skattalógini."

§ 1, nr. 5 affattes således:

5) Som § 5 indsættes:
"Bestemmelserne i §§ 3 og 4 er også gældende for renter af færøske obligationer, jfr. § 1.
Stk. 2. Rennte af færøske obligationer beskattes med 35% p.a.
Stk. 3. Rente sskal angives til beskatning på selvangivelsen for vedkommende år efter reglerne i skatteloven."

Minnilutin (Jørgen Niclasen) hevur niðanfyri standandi viðmerkingar:

Uppskotini eru í høvuðsheitum í tveimum. Ein partur um útskriving og skatting av føroyskum lánsbrøvum og ein um hækking av rentuskattinum úr verandi ávikavist 18% og 22% upp í 35%.

Ein tvífaldan av rentuskattinum metir fólkaflokkurin vera niðurbrótandi og ein framhaldandi eyðrænning av teimum, sum hava spart saman. Samansparing er neyðug í einum samfelag, og tí má hesin hugur stimbrast og ikki øvugt. Ein broyting, minnilutin mælir frá at samtykkja.

Viðvíkjandi lánsbrøvum er fört fram undir nevndarviðgerðini, at landskassar í Europa og aðrastaðni ikki lána frá bankum, men heldur loysa sín fíggingartørv við sølu av lánsbrøvum. Fólkaflokkurin er av teirri áskoðan, at hetta eisini hevði verið ein góður fíggingarháttur fyri tann føroyska landskassan undir vanligum umstøðum.

Útskriving av føroyskum lánsbrøvum nú, kann loysa tann akutta likviditetstørvin hjá

landskassanum, men virkar í framtíðini sum ein kavaböltur, vit skumpa frammanfyri okkum.

Trupulleikarnir, føroyska samfelagið og landskassin hava nú og í framtíðini, krevja radikalar broytingar, har útskriving av lánsbrøvum nú kann gerast eitt haft um beinið.

Ein vælevdnað søla av føroyskum lánsbrøvum verður við til at uppihalda ójavnanum millum tann berandi vinniliga sektorin og tann yvirbygda almenna sektorin. Vit fáa ein landskassa, ið ikki rindar eitt oyra í avdráttum og ikki klárar helvtina av rentunum, ein landskassa við størri og størri skuld.

Fólkaflokkurin hevur fleiri ferðir víst á hvat er neyðugt um her skal vera lív lagað. Neyðugt er aftur at skapa lønsemi í vinnulívið, lønsemi hjá tí einstøku familjuni og lønsemi í landskassan. Vit mugu lækka kostnaðatstøðið, soloiðis sum ein meiriluti á løgtingi hevur skrivað undir uppá. Hetta sum gevur vinnulívinum og tí einstaka livilíkindi.

Landskassans vegna hava vit eina líggjarlúg við rentuútreiðslum upp í móti tí hálvu milliardini. Her verður neyðugt at royna tann møguleikan, sum sjálvt danskir professarar mæla til, nevniliga kapitaliscring av blokkinum.

Neyðugt er at taka upp samráðingar við donsku stjórnina við hesum fyri eyga. Í stuttum má blokkurin gerast upp í eitt virði út frá einum áramál:. Virðið uppá 14 mia. kr. er fyrr roknað út. Av hesi upphædd skal so skuldin uml. 6 mia. kr. mótroknast og restin útgjaldast í einum ella yvir eitt áramál.

Henda kapitalisering hevði loyst upp fyri teimum bindingum, ið áliggja okkum, givið okkum møguleika at virka og ikki minst givið okkum skotbrá til at laga samfelagið til tilfeingið.

Minnilutin mælir frá at samtykkja uppskot landsstýrisins, men setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til
samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp samráðingar við donsku stjórnina við kapitalisering av blokkinum fyri eyga.

2. viðgerð 2. desember 1994. Uppskotið við broytingum frá nevndini samtykt við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð 5. desember 1994. Málið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 120 frá 13. desember 1994.

52 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, týsdagin 8. november 1994 legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:
§ 25, nr. 3, litra b, pkt. 1 verður orðað soleiðis:
"Renta av føroyskum lánsbrøvum, sum verður skattað eftir reglunum í løgtingslóg um rentuskatt."

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi 1. januar 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:
§ 25, nr. 3, litra b, pkt. 1 affattes således:
"Rente af færøske obligationer, der skattes i henhold til reglerne i lagtingslov om renteskat."

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Felags viðmerkingar til uppskot til broyting av skatta-, rentu- og virðisbrævaskattalógini í samband við lánsbrævaupptøku.

(Sí viðmerkingar til løgtingsmál nr. 51/1994)

Viðmerking til broytingina í skattalógini:

Broytingin í skattalógini er ein tillaging av skattareglunum viðvíkjandi skatting av rentum av føroyskum lánsbrøvum. Hetta er ein ávísing frá skattalógini til, at fyritreytin fyri at renta av føroyskum lánsbrøvum ikki verður skattsett samsvarandi reglunum í skattalógini er, at renta verður skattað sambært reglunum í rentuskattalógini við 35% rentuskatti.

1. viðgerð 10. november 1994. Málið var beint í skattanevndina, sum 29. november legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 51/1994.

2. viðgerð 2. desember 1994. Málið samtykt við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð 5. desember 1994. Málið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 121 frá 13. desember 1994.

53 Broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum

Ár 1994, týsdagin 8. november legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 40 frá 17. apríl 1986 um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum við seinni broyting verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Reglurnar í hesi lóg fevna um virðisbrøv so sum partabræv, pantibrøv, lánsbrøv, skuldarbrøv, lutaprógv v.m."
2) Í § 1, stk. 2 verður sum pkt. 3 sett:
"Innfrían og onnur avhending enn søla verða í hesi lóg javnsett við sølu.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om skat i forbindelse med salg af værdipapirer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 40 af 17. april 1986 om skat i forbindelse med salg af værdipapirer mes senere ændring foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 1 affattes således:
"Bestemmelserne i denne lov omfatter værdipapirer så som aktier, pantebreve, obligationer, gældsbreve, andelsbeviser m.v."
2) I § 1, stk. 2 indsættes som pkt. 3:
"Indfrielse og anden afståelse end salg sidestilles i denne lov med salg, jfr.

smbr. tó § 5."

3) Aftaná § 2 verður sum nýggj § 2 a sett:

"**§ 2 a.** Tá talan er um lánsbrøv et 3 ára reglan í § 2, stk. 1 og 2 og í § 4 ikki galdandi, men verður vinningur í samband við sølu ella innfrían av lánsbrøvum tá skattaður við tí til eina og hvørja tíð galdandi avgjaldi á rentum av lánsbrøvum sambært rentuskattalógini uttan mun til ognartíð.

Stk. 2. Vinningur eftir stk. 1 skal gevast upp til skattingar á sjálvuppgávuni fyri viðkomandi ár eftir reglunum í skattalógini.

Stk. 3. Tap við sølu ella innfrían av lánsbrøvum kann bert dragast frá í staðfestum vinningi av lánsbrøvum og annars samsvarandi áseting unum í § 2, stk. 2, pkt. 2 og 3."

4) Aftaná § 5 verður sum § 5 a sett:

"**§ 5 a.** Landsstýrið kann áseta nærri reglur um fyrisitingina og útinningina av hesi lóg."

5) Aftaná § 5 a verður sum § 5 b sett:

"**§ 5 b.** Reglurnar í skattalógini, herundir eisini revsireglurnar, eru annars galdandi fyri skatt av vinningi og frádrátti av tapi eftir hesi lóg, har ikki annað beinleiðis er ásett í lógini.

Stk. 2. Í reglum, sum ásettar verða við heimild í § 5 a, kann ásetast revsing við bót fyri brot á ásetingarnar í hesum reglum.

Stk. 3. Bót eftir hesi lóg fellur til landskassan."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1995.

dog § 5."

3) Efter § 2 indsættes som ny § 2 a:

"**§ 2 a.** Når der er tale om obligationer, er 3 års reglen i § 2, stk. 1 og 2 og i § 4 ikke gældende, men bliver fortjeneste i forbindelse med salg eller indfrielse af obligationer beskattet med den til enhver tid gældende afgiftssats på renter af obligationer i henhold til renteskatteloven uanset ejertid.

Stk. 2. Fortjeneste efter stk. 1 skal angives til beskatning på selvangivelsen for vedkommende år efter reglerne i skatteloven.

Stk. 3. Tab ved salg eller indfrielse af obligationer kan kun fradrages i konstateret fortjeneste af obligationer og ellers i henhold til reglerne i § 2, stk. 2, pkt. 2 og 3."

4) Efter § 5 indsættes som § 5 a:

"**§ 5 a.** Landsstyret kan fastsætte nærmere bestemmelser om administrationen og gennemførelsen af denne lov."

5) Efter § 5 a indsættes som § 5 b:

"**§ 5 b.** Reglerne i skatteloven, herunder strafbestemmelserne, gælder i øvrigt for skat af fortjeneste og fradrag af tab efter denne lov, hvor ikke andet direkte er foreskrevet i loven.

Stk. 2. I forskrifter, der fastsættes med hjemmel i § 5 a, kan der fastsættes straf med bøde for overtrædelse af bestemmelserne i forskrifterne.

Stk. 3. Bøde efter denne lov tilfalder landskassen."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Felags viðmerkingar til uppskot til broyting av skatta-, rentu- og virðisbrævaskattalógini í samband við lánsbrævaupptøku.

Fylgjandi uppskot landsstýrisins um broytingar í løgtingslógunum um rentuskatt, skattalógini og virðisbrævaskattalógini viðgera øll spurning um skatting av føroyskum lánsbrøvum.

Í avtaluni við donsku stjórnina frá 12. oktober 1993 varð staðfest, at landsstýrið sjálvt við lántøku í Føroyum ella á danska kapitalmarknaðinum skal fíggja eitt møguligt hall á fíggjarlógini fyri 1994. Í hesum sambandi hevur Landsbanki Føroya fyrireikað lánsbrævaupptøku.

Í fyrireikingunum hevur verið miðað ímóti, at lánsbrøvini skulu vera neutral móti teimum føroysku peningastovnunum, soleiðis at lánsbrøvini ikki koma at verða kappingaravlagandi mótvegis innláninum í peningastovnunum. Tað er soleiðis ynskiligt, at lánsbrøvini verða skattað á sama hátt, sum innlánini í peningastovnunum, t.v.s. at bæði rentan og kursvinningur verða skattað við sama prosentsatsi, sum innlánini í bankanum og sparikassunum. Fyri at røkka hesum endamáli er neyðugt við broytingum í reutuskattalógini, skattalógini og virðisbrævaskattalógini.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

ad 1: Broyting nr. 1 er ikki nøkur beinleiðis innihaldslig broyting í vavinum á virðisbrævaskattalógini, men bert ein neyvari umorðing, so skilt verður millum lánsbrøv og skuldarbrøv, nú tá lánsbrøv/obligatiónir skulu viðgerast á serligan hátt í mun til virðisbrævaskattalógina.

ad 2: Henda broyting førir við sær, at eitt nú innfrían av lánsbrøvum sambært reglunum í virðisbrævaskattalógini verður javnsett og viðgjørd, eins og talan er um sølu, hvat viðvíkur staðfestum vinningi ella tapi.

ad 3: Fyri lánsbrøv verður her gjørd ein áseting, sum førir við sær, at tá spurningurin um skatting av vinningi av lánsbrøvum skal viðgerast, er ikki avgerandi, hvussu long ognartíðin hevur verið, tí vinningur av lánsbrøvum kemur altíð at vera undir avgjaldsskyldu.

Staðfest tap av lánsbrøvum kann bert dragast frá í staðfestum vinningi av lánsbrøvum, og um tap ikki rúmast innan vinning tað einstaka árið, kann tapið førast fram til staðfestan vinning av lánsbrøvum eftirfylgjandi ár, tó í mesta lagi 5 ár.

Staðfestur vinningur/tap skal gevast upp á sjálvuppgávuni fyri avvarðandi ár, so sum fyriskrivað annars er sambært skattalógini, og skal hetta gerast, hóast vinningur sum so ikki inngongur í skattskyldugu inntøkuna, so sum hon er definerað í skattalógini, men ístaðin verður avgjaldsskattað við 35% eftir fyriliggjandi uppskoti.

ad 4 og 5: Í broytingunum 4 og 5 verða innførdar heimildir til landsstýrið at seta neyvari reglur fyri fyrisitingina av lógini, og hvussu lógin kann fremjast, eins og heimild verður skapað fyri revsing samsvarandi skattalógini og annars í kunngerðum,

sum verða settar út við heimild í virðisbrævaskattalógini.

1. viðgerð 10. november 1994. Málið varð beint í skattanevndina, sum 29. november legði fram soljóðandi felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 51/1994.

2. viðgerð 2. desember 1994. Uppskotið samtykt við 20-0 atkvøðum. Uppskot minnilutans til samtyktar fall við 8-1 atkvøðum.

3. viðgerð 5. desember 1994. Málið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

Lóg nr. 122 frá 13. desember 1994.

54 Løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn

Ár 1994, týsdagin 8. november legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um minstuløn til útróðrarmenn.

§ 1. Við tí endamáli at tryggja inntøkur útróðrarmanna verður landsstýrinum heimilað at útgjalda minstuløn til manning á fiskiførum á útróðri á føroysku landleiðini í tíðini frá 1. november 1994 til 28. februar 1995.

§ 2. Manning á fiskiførum á útróðri á føroysku landleiðini kann verða latin minstaløn til útróðrarmenn. Treytin fyri minstuløn til útróðrarmenn er, at fiskifarið

lagtingslov om mindsteløn til hjemmefiskere.

§ 1. Med det formål at sikre hjemmefiskernes indtægter er Landsstyret bemyndiget til at udbetale mindsteløn til mandskab på fartøjer i hjemmefiskeri i færøsk fiskerizone i perioden fra 1. november 1994 til 28. februar 1995.

§ 2. Til mandskab på fartøjer i hjemmefiskeri i færøsk fiskerizone kan ydes mindsteløn for hjemmefiskeri. Betingelsen for udbetaling af mindsteløn til hjemme-

hevur avreitt minst 10 ferðir undanfarnu 3 mánaðirnar, at manningin verður avroknað og í tali er, sum vanligt er á staðnum, at øll veiða verður avreidd undir einum.

Stk. 2. Fyri fiskifør undir 20 BRT eru harafturat hesar reglur galdandi:

a)

At fiskifar, sum roynir við snellu ella snøri, avreiðir minst 15 kilo upp á mannin fyri hvønn veiðidag.

b)

At fiskifar, sum roynir við línu, avreiðir minst 25 kilo upp á mannin hvønn veiðidag.

§ 3. Um manning á útróðrarfari skal koma undir skipanina við minstuløn fyri útróðrarmenn, skal bátsformaðurin fyri hvønn mánað lata Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna skrivliga fráboðan og lista yvir manning. Fráboðanin og listin yvir manningina skal vera Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna, undirskrivað av manning og bátsformanni, í hendi í seinasta lagi 1. dagin í mánaðinum ætlanin er at koma undir skipanina, tó fyrstu ferð í seinasta lagi fimm dagar eftir, at lógin er lýst.

§ 4. Minstaløn til útróðrarmenn er kr. 7.500,00 um mánaðin. Um minstaløn, fiskipartur og onnur inntøka hjá útróðrarmanni samanlagt fer upp um kr. 12.725,00 um mánaðin, útgoldið verður fyri, verður minstaløn minkað við sama krónutali, sum øll inntøkan fer upp um kr. 12.725,00.

§ 5. Um avloysari ella nýggjur maður kemur við á fiskifar fyri annan mann, fráboðar bátsformaðurin Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna hvørjar dagar, viðkomandi maður skal hava minstuløn fyri.

§ 6. Minstaløn til útróðrarmenn verður avroknað mánaðin eftir, at hon er vunnin.

fiskere er, at fiskefartøjet har landet mindst 10 gange i de sidste 3 forudgående måneder, at mandskabet bliver afregnet og i antal er som sædvane er på stedet, at fangsten bliver landet samlet.

Stk. 2. For fiskefartøjer under 20 BRT er yderligere disse regler gældende:

a)

At fiskefartøjer, som fisker med snelle eller snøre, lander mindst 15 kilo pr. mand pr. dag.

b)

At fiskefartøj, som fisker med langline, lander mindst 25 kilo pr. mand pr. dag.

§ 3. Hvis mandskabet på et hjemmefiskerfartøj skal komme ind i ordningen med mindsteløn for hjemmefiskere, skal bådsformanden for hver måned sende Fiskernes Lønudligningsfond skriftlig tilmelding og liste over mandskabet. Tilmelding og liste over mandskabet skal være Fiskernes Lønudligningsfond i hænde, underskrevet af mandskab og bådsformand, senest den 1. i den måned i hvilken man agter sig under ordningen, dog første gang senest fem dage efter, at loven er bekendtgjort.

§ 4. Mindstelønnen for hjemmefiskere er kr. 7.500,00 om måneden. Hvis hjemmefiskerens mindsteløn, fangstandel og anden indtægt sammenlagt overstiger kr. 12.725,00 i den måned, som der skal udbetales for, reduceres mindstelønnen med samme antal kroner, som hele indtægten overstiger kr. 12.725,00.

§ 5. Om afløser eller ny mand kommer med på fiskerfartøj for anden mand meddeler bådsformanden Fiskernes Lønudligningsfond, hvilke dage vedkommende mand skal have mindsteløn.

§ 6. Mindstelønnen til hjemmefiskere bliver afregnet måneden efter, den er op-

tjent.

§ 7. Útróðrarmenn velja sjálvir, um teir koma undir skipanina við minstuløn ella fáa minstaforvinning.

§ 7. Hjemmefiskere vælger selv, om de kommer med i ordningen med mindsteløn eller får mindsteindtægt.

§ 8. Henda lóg fær gildi 1. november 1994 og fer úr gildi aftur 28. februar 1995.

§ 8. Denne lov træder i kraft 1. november 1994 og ophæves igen 28. februar 1995.

Viðmerkingar:

Skipanin við minstuløn til útróðrarmenn varð roynd í mars og apríl 1994. Í mars mánaði vóru 102 bátar við samanlagt 286 monnum meldaðir til skipanina og fingu samanlagt útgoldnar 1,8 mill. kr. Í apríl mánaði vóru 84 bátar við samanlagt 241 monnum meldaðir til skipanina og fingu samanlagt útgoldnar 1,5 mill. kr.

Teir báðar mánaðirnar royndarskipanin var, vórðu kr. 3.338.590,79 útgoldnar í minstuløn til útróðrarmenn, sum gevur kr. 6.335,09 í miðal uppá mannin. Eftir royndarskipanini at døma má metast, at henda minstulønarskipanin í minsta lagið vil kosta 1,6 til 1,7 mill. kr. um mánaðin.

Fyri tíðarskeiðið, sum uppskotið umfatar frá 1. november 1994 til 28. februar 1995, má metast, at skipanin í minsta lagi fer at kosta uml. 6.7 mill. kr., roknað eftir at 265 mans verða í skipanini hvønn mánað og í miðal fáa útgoldnar kr. 6.335,09 um mánaðin.

Av tí at talan er um vetrarmánaðirnar og tí møguleiki fyri færri túrum og vánaligari fiskiskapi, er vandi fyri, at skipanin gerst munandi dýrari, í ringasta fall kanska meira enn dupult so dýr.

Tá bátsmanning verður meldað til skipanina, vita teir ikki, hvussu veður ella fiskiskapur verður komandi mánaðin. Kanska verður eingin túrur; men við at meldað seg inn í skipanina tryggja teir sær kr. 7.500,-, tí teir vita, at teir hava 10 túrar undanfarnu tríggjar mánaðirnar.

Útróðrarmenn vilja eisini rokna soleiðis, tá avgjørt verður, um meldast skal til minstulønarskipanina ein mánað, ella um teir skulu verða undir skipanini við minstaforvinningi, at fyri at verða tryggjaðir meira enn tær 7.500 krónurnar í minstuløn, skulu teir, um roynt verður við línu, hava minst átta túrar à 959 krónur í minstaforvinningi ella, um roynt verður við snellu, skulu hava minst 16 túrar à 480 krónur í minstaforvinningi.

Úrslitið kann tí gerast, at tað verða munandi fleiri mans inni í skipanini, og at fleiri fáa fulla minstuløu. Ikki er óhugsandi, at talan kann verða um 500 mans, ið, um allir fáa fult, vil kosta kr. 3.750.000,- mill. kr. um mánaðin, tvs. uml. 15 mill. kr. í fýra

mánaðir.

Smb. kostnaðarmeting bygd á saldolista frá Lønjavningargrunninum frá 30. september 1994 verða útgoldnar 83,1 mill. kr. í inntøkutrygd til fiskimenn í 1994 av játtanini, ið er 87 mill. kr. 3,9 mill. kr. skuldu sostatt verið til taks. Mett verður, at minstiforvinningurin fyri november og desember verður uml. 2 - 3 mill. kr. um eingin minstulønarskipan verður til útróðrarmenn. Verður minstulønarskipanin sett í gildi, minkar útgjaldingin av minsta-forvinningi hesar mánaðirnar, tó helst ikki so nógv sum minstalønin fer at kosta.

Eftir teimum tølum umsitingin hevur í dag, má metast, at fíggjarkarmurin til inntøkutrygd hjá útróðrarmonnum í mesta lagi vil verða 3,9 + 2,1 tvs. 6 mill. kr. síðstu tveir mánaðirnar av 1994.

Heldur hendan meting, er fígging til minstulønarskipanina til útróðrarmenn, sjálvt um hon verður nakað dýrari enn lægsta kostnaðarmetingin.

1. viðgerð 10. november 1994. Málið var beint í fiskivinnunevndina, sum 11. november legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 8. november 1994 og eftir 1. viðgerð tann 10. november 1994 beint í fiskivinnunevndina.

Nevdin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna og stjóran á Arbeyðsloysistryggingini.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Karl Robert Johansen og Helena Dam á Neystabø) vísir á, at manningartalið á bátum upp til 10 BRT í løtuni er sett til 3 mans, millum 10 og 15 BRT 4 mans og millum 15 og 20 BRT 5 mans. Meirilutin mælir til, at í tíðarskeiðinum, lógin um minstuløn til útróðrarmenn er galdandi, verður manningartalið hækkað til ávikavist 4, 5 og 6.

Treytin fyri at fáa minstuløn, eftir § 2, er, at fiskifarið hevur avreitt minst 10 ferðir seinastu trýggjar mánaðarnar. Meirilutin mælir til, at hetta skeiðið verður roknað soleiðis, at tað er galdandi frá mánaðinum, farið verður í skipanina við minstuløn og tveir mánaðar frammanundan og mælir til at broyta § 2, stk. 1 samsvarandi hesum.

Í § 2, stk. 2 er ásett hvørja nøgd fiskifør undir 20 BRT skulu avreiða upp á mannin hvønn veiðudag. Meirilutin mælir til, at hesar reglur verða galdandi fyri øll fiskifør og setir fram broytingaruppskot hesum viðvíkjandi.

Í § 4 mælir nevndin til at orðingin "onnur inntøka" verður broytt til "onnur arbeiðs-

inntøka".

Í § 6 verður mælt til at skoyta uppí, at minstalønin verður avroknað so skjótt sum mánaðar uppgerðin er innkomin.

Í § 7 verður mæli til skoyta uppí, at teir, sum ikki lúka treytirnar um minstuløn, verða verðandi í skipanini um minstaforvinning.

Við hesi broytingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1)
Í § 2., stk. 1 verður skoytt uppí."Hetta 3 mánaðarskeiðið verður roknað soleiðis, at tað er galdandi frá mánaðinum farið verður í skipanina við minstuløn og tveir mánaðar frammanundan."

2)
Í § 2., stk. 2 verður orðingin "Fyri fiskifør undir 20 BRT eru harumframt hesar reglur galdandi." broytt til: "Harumframt eru hesar reglur galdandi:"

3)
Í § 4. verða orðini "onnur inntøka" broytt til "onnur arbeiðsinntøka".

4)
Í § 6. verður skoytt uppí: "so skjótt. sum mánaðar uppgerðin er innkomin."

5)
Í § 7. verður skoytt uppí: "Um teir ikki lúka treytirnar um minstuløn, verða teir verðandi í skipanini um minstaforvinning."

1)
I § 2., stk. 1 tilføjes: "Denne 3 måneders-periode regnes således, at den er gældende fra den måned man kommer under ordningen med mindsteløn og to måneder i forvejen."

2)
I § 2., stk. 2 ændres "For fiskefartøjer under 20 BRT er yderligere disse regler gældende:" til "Desuden gælder disse regler:"

3)
I § 4. ændres ordene "anden indtægt" til "anden arbejdsindtægt".

4)
I § 6. tilføjes: "så hurtigt som den månedlige opgørelse er indkommet."

5)
I § 7 tilføjes: "Om de ikke opfylder betingelserne for mindsteløn forbliver de i ordningen om mindsteindtægt."

Minnilutin (John Petersen og Jákup Olsen) vísa á, at tá loyvt verður at hava fleiri menn við á bátinum, verður neyðugt at lækka kilotalið, avreitt verður fyri hvønn mannin, um

sami møguleiki skal verða galdandi sum higartil og mælir til at ásettu kilotølini í § 2., stk. 2 frá ávíkavis 15 kilo og 25 kilo verða broytt til 10 og 20 kilo. Eisini mælir minnilutin til at hækka mánaðargjaldið úr kr. 7.500 til kr. 8.500 og vísir á uppskot landsstýrisins um broytingar í arbeiðsloysistryggingini, sum liggur í tinginum, har útgjaldið verður hækkað og rullandi útgjaldið verður tikið av. Samsvarandi hesum setir minnilutin (John Petersen og Jákup Olsen) fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 2., stk. 2, verður undir a) "15" broytt til "10" og undir b) "25" broytt til "20".	1) I § 2., stk. 2, ændres under a) "15" til "10" og under b) "25" til "20".
2) Í § 4. verður "7.500" broytt til "8.500".	2) I § 4. ændres "7.500" til "8.500".

Í øðrum lagi tekur minnilutin (John Petersen og Jákup Olsen) undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) hevur hesar viðmerkingar: Tá ið tað sær úr til, at løgtingsmál nr. 23/1994: Løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn ikki hevur møguleika at verða samtykt á hesum sinni, tekur minnilutin undir við uppskoti landsstýrisins við teimum broytingum, meirilutin hevur skotið upp. Annars verður víst til løgtingsmál nr. 23/1994.

2. viðgerð 22. november 1994. Uppskotið sum broytt av meirilutanum í nevndini samtykt við 28-0 atkvøðum. Broytingaruppskot minnilutans (J. Petersen og J. Olsen) fall við 9-0 atkvøðum. Uppskot frá John Petersen, løgtingsmanni um at beina málið aftur í nevnd fall við 15-0 atkvøðum.

3. viðgerð 24. november 1994. Málið endaliga samtykt 25-0 atkvøðum.

Lóg nr. 116 frá 25. november 1994.

55 Broyting í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde"

Ár 1994, hósdagin 10. november legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde".

§ 1.

Í "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" sbr. "Anordning nr. 389 af 15. november 1966", sum broyttur við "Anordning nr. 281 af 22. juni 1979", verður gjørd henda broyting:

Aftaná § 10 verður sett:

"**§ 10 A.** Fyri mál, sum eru fevnd av hesi fyriskipan krevur ráðið gjøld frá Føroya Vanlukkutrygging.

Stk. 2. Landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur um tey í stk. 1 nevndu gjøld, sum ikki mugu vera hægri enn verulígu útreiðslurnar av málsviðgerðini."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1995.

lagtingslov om ændring i Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde.

§ 1.

I anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde, jf. anordning nr. 389 af 15. november 1966, som ændret ved anordning nr. 281 af 22. juni 1979, foretages følgende ændring:

Efter § 10 indsættes:

"**§ 10 A.** I sager, som er omfattet af denne anordning, opkræver rådet afgift fra Føroya Vanlukkutrygging.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter nærmere regler om den i stk. 1 nævnte afgift, der ikke må overstige de faktiske udgifter ved sagsbehandlingen."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Sambært galdandi lóggávu, er Vanlukkutryggingarráðið játtandi myndugleiki, tá talan er um mál um avlamispensjón.

Í málum um framskundaða fólkapensjón, gevur Vanlukkutryggingarráðið landsstýrinum tilmæli.

Vanlukkutryggingarráðið viðger annars mál, sum eru fevnd av "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde".

Landsstýrið ætlar at broyta avlamispensjónslógina og fólkapensjónslógina soleiðis, at tað skal vera Almannastovan, sum skal vera játtandi myndugleiki, tá talan er um ávikavist avlamispensjón og framskundaða fólkapensjón. Tá neyðugar lógarbroytingar eru gjørdar hesum viðvíkjandi, fer Vanlukkutryggingarráðið einans at viðgera vanlukkutryggingarmál.

Sum er verður raksturin hjá Vanlukkutryggingarráðnum fíggjaður við einari serligari játtan á løgtingsins fíggjarlóg. Í fjør vórðu játtaðar 500.000 kr. Í ár eru játtaðar 100.000 kr. við tað, at roknað varð við, at omanfyrinevndu lógarbroytingar vórðu settar í verk. Til tess at fíggja raksturin hjá ráðnum framyvir, skjýtur landsstýrið upp at Føroya Vanlukkutrygging skal gjalda fyri mál, sum verða viðgjørd eftir "Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" og at landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur um frammanfyri nevndu gjøld, sum ikki mugu vera hægri enn veruligu útreiðslurnar av málsviðgerðini.

Viðmerkjast skal, at lógaruppskotið áður er samtykt á landsstýrisfundi 1. mars 1994 og lagt fram í løgtinginum 4. mars 1994. Aftaná at løgtingsval varð útskrivað í summar, fall málið burtur.

Vegna tess, at alt ov lítið er játtað á løgtingsins fíggjarlóg, verður neyðugt við eini cykajáttan til tess at tryggja raksturin í ár. Somuleiðis er neyðugt at avseta ávísa upphædd á fíggjarløgtingslógina fyri 1995 til útreiðslur í samband við málsviðgerðina hjá vanlukkutryggingarráðnum av málum um framskundaða fólkapensjón og avlamispensjón.

1. viðgerð 24. november 1994. Málið var beint í almanna- og heilsunevndina, sum 24. januar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 10. november 1994 og varð aftaná 1. viðgerð tann 24. november 1994 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Málsøkið "Lógskyldug Vanlukkutrygging" varð yvirtikið sum føroyskt sermál sambært kunngerð nr. 32 frá 28. mars 1980, og ber tað tí til at broyta " Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" við løgtingslóg.

Ætlan landsstýrisins er, at Almannastovan skal taka yvir tær uppgávur og heimildir, ið Vanlukkutryggingarráðið hevur viðvíkjandi avlamispensión og framskundaðari fólkapensión, og at málsviðgerðin hjá Vanlukkutryggingarráðnum, ið framyvir bert skal viðgera mál, ið eru fevnd av " Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af

ulykkestilfælde" skal fíggjast við, at Vanlukkutryggingarráðið skal kunna krevja Føroya Vanlukkutrygging eftir gjaldi, ið verður góðkent av landsstýrinum.

Ein sand almanna- og heilsunevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 27. januar 1995. Málið samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 31. januar 1995. Málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 30 frá 14. februar 1995.

FL jnr. 1020-4/92.

56 Góðkenning av WTO-avtaluni

Ár 1994, hósdagin 10. november legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir at Danmark uttan fyrivarni fyri luttøku Føroya ratifiserar WHO-avtaluna frá 15. apríl 1994.

Viðmerkingar:

Í skrivi frá donsku stjórnini dagfest 12. september 1994 verður spurt, um Føroya Landsstýri ynskir, at fyrivarni fyri luttøku Føroya í WTO-avtaluni skal takast, tá ið Danmark um stutta tíð (1. desember 1994) ratifiserar avtaluna.

Við skrivinum er lagt eintak av avtaluni, upprit úr uttanríkismálaráðnum frá 5. januar 1994 og 6. september 1994. Hesi eru eisini løgd við hesum máli.

Sama tilfar er 12. september 1994 sent Menningarstovuni, vinnuleløgum og Skatt- og

tollstovuni til ummælis við svarfreist 15. oktober 1994. Svarskriv teirra eru hjáløgd.

WTO (World Trade Organization) er avloysari av og menning av skipanini rundanum galdandi GATT-avtaluna (General Agreement of Trade and Tariffs). Føroyar eru partur av GATT-skipanini.

GATT og WTO eru í stuttum avtalur gjørdar millum flest øll lond í heiminum (WTO - 111 lond) til tess at seta reglur fyri handilslívið v.m. millum lond á ein slíkan hátt, at so fáar forðingar sum møguligt verða, og at fyribyrgja kappingaravlagan í størst møguligan mun.

Ein kann eisini á ein hátt siga, at WTO er grundlóg heimshandilsins og við hesum eisini setur karmar fyri seravtalum millum einstøk lond, eitt nú okkara avtalur við EFTA-londini og EU.

Á henda hátt er okkara handilsliga samskifti við lond, sum vit av onkrari orsøk ikki hava sínámillum sáttmála við, allíkavæl rímiliga væl skipað, samstundis sum WTO - í løtuni GATT - er grundarlagið undir verandi sínámillum sáttmálum okkara.

Støðan aftaná seinasta fundin um WTO í Marakech er, at stórt sað øll lond, ið hava limaskap í GATT, siga seg úr hesum og melda seg í WTO. Uppií hesum eru týðningarmiklastu handilspartnarar okkara EU, EFTA-londini, U.S.A. og Japan.

Verandi samskifti okkara, serliga við størsta og týðningarmiklasta samhandilspartnara okkara (sí frammanfyri), er farið fram og við somu londum (EU og EFTA-londini) skipað í sáttmálum, ið hvíla á heimsumfatandi felagsreglum (GATT), og er tí umráðandi, at vit eins og vit hava verið partur av GATT, verða partur av tí, sum kemur ístaðin fyri GATT, nevniliga WTO.

Negativu avleiðingarnar av at taka fyrivarni eru væl lýstar í skrivunum frá ummælandi stovnum og feløgum og upprit úr danska uttanríkismálaráðnum.

Vísandi til, at svar okkara eigur at verða sent WTO saman við donsku tilmeldanini, ið væntandi fer fram í desember 1994, **verður biðið um skjóta viðgerð.**

1. viðgerð 22. november 1994. Málið var beint í marknaðarnevndina, sum 2. desember legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 10. november og eftir 1. viðgerð 22. november 1994 beint í marknaðarnevndina. Marknaðarnevndin hevur síðani viðgjørt málið so gjølla, sum tíðarfreistin gjørdi tað møguligt.

Uppskotið til samtyktar snýr seg um, at føroyska heimastýrið góðtekur, at Føroyar uttan fyrivarni verða fevndar av WTO- avtaluni, sum Danmark um stutta tíð fer at góðkenna.

Seinastu sjey árini hava flestu lond í heiminum tingast um at menna GATT-avtaluna, ið er alheims handilsavtala (General Agreement of Trade Tariffs). Samráðst hevur verið í fleiri umførum, og seinastu tíðina eru tað serstakliga USA og EU-kommisiónin, ið hava tingast. WTO-avtalan er úrslitið av hesum samráðingum, og mælir landsstýrið eins og uttanríkismálaráðið til, at Føroyar gerast partur av WTO saman við Danmark, eins og Føroyar hava verið partur av GATT-avtaluni.

Landsstýrið hevur biðið Menningarstovuna, Toll og Skattstovuna og Føroya Arbeiðsgevarafelag um tilmæli, og mæla allir til, at Føroyar gerast partur í WTO avtaluni. Tó verður í øllum trimum tilráðingunum lagt afturat, at alt ov stutt tíð hevur verið, at seta seg inn í málið.

Í viðmerkingunum til uppskotið til samtyktar ger landsstýrið vart við, at málið hevur stóran skund, av tí, at Danmark longu 1. desember skal staðfesta og seta WTO-sáttmálan í gildi.

Marknaðarnevndin hevur sostatt havt alt ov stutt skotbrá at seta seg gjølla inn í málið, sum er sera sera rúgvismikið, og vil marknaðarnevndin nýta høvi at gera Føroya Landsstýri vart við, at tílík málsviðgerð kann ikki góðtakast. Tað er neyðugt at bæði landsstýri og løgting framhaldandi fylgja væl við í uttanríkispolítiskum málum. Tingingarnar um WTO-sáttmálan hava vart í sjey ár, men tá ið Føroyar skulu taka støðu til, um vit eiga at vera innanfyri ella uttanfyri hetta samstarv, fær løgtingið bert 14 dagar til støðutakan. Somuleiðis vil marknaðarnevndin heita á landsstýrið um framyvir at skriva stuttan samandrátt av so rúgvismiklum tilfari, sum talan er um í hesum føri, og at seta tað greitt upp viðvíkjandi t.d. fyrimunum og vansum.

Undir viðgerðini hevur marknaðarnevndin havt fund við Kjartan Kristiansen, stjóra á Menningarstovuni, Tommy Petersen, fulltrúa í landsstýrinum, Torbjørn Mikkelsen, frá Toll- og Skattstovuni og Niclas Rasmussen, ið rekur bæði inn- og útflutningsfyritøku. Somuleiðis hevur nevndin verið í sambandi við P. H. Hagedorn í danska uttanríkismálaráðnum. Frá øllum kom sama tilmæli, at Føroyar eiga at halda fram í altjóða samstarvinum um handils- og tollviðurskifti og sostatt taka undir við WTO-avtaluni.

Fulltrúin í landsstýrinum upplýsti, at Grønland hevur tikið undir við avtaluni.

Marknaðarnevndin ásannar, at Føroyar hava tikið lut í liberaliseringini av heimshandlinum, sum er farin fram seinnu árini, og mælir til, at hildið verður fram á hesi kós, av tí at høgir tollgarðar á alheimsøkinum mugu metast at vera stórt vandamál fyri føroyskan útflutning. Eisini er umráðandi, at vit varðveita tann fyrimun viðv. tolli (mestbegunstigelse), sum vit eiga í hinum GATT-londunum, sum at kalla øll fara upp í WTO-samstarvið og úr GATT-samstarvinum.

Tó hevur marknaðarnevndin fest seg við, at WTO-samstarvið fevnir um fleri øki enn GATT-samstarvið gjørdi. Umframt at skipa <u>handil við vørum, snýr avtalan seg eisini um handil við tænastuveitingum, um reglur um fløgur og stovnsetan av virkjum og um vitborin ognarrættindi</u>.

Spurningurin er, hvussu altjóða avtalur á hesum økjum koma at ávirka viðurskiftini á føroyska arbeiðsmarknaðinum, møguleikarnar at byggja upp ein føroyskan heimamarknað og møguleikarnar at tryggja føroyskt virksemi í framtíðini. Marknaðarnevndin hevur spurt seg fyri m.a. í danska uttanríkismálaráðnum, men upplýsti P. H. Hagedorn, at honum vitandi vóru avtalurnar á hesum nýggju økjunum als ikki lidnar. Marknaðarnevndin fer at áleggja landsstýrinum at fylgja væl við, hvat framhaldandi fer at henda innan WTO-samstarvið, og at fáa kannað og greinað, hvussu hesar avtalur um tænastuveitingar og um íløggur og stovnsetan av virkjum koma at virka í Føroyum. Hetta til tess at fyrivarni kunnu takast í samráð við danska uttanríkismálaráðið í góðari tíð, um tað gerst neyðugt.

Við hesum viðmerkingum mælir **ein samd marknaðarnevnd** løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins til samtyktar.

2. viðgerð 5. desember 1994. Málið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

57 Sparingar og bygnaðarbroytingar í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum

Ár 1994, hósdagin 10. november legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at greiða løgtinginum frá, hvørjar sparingar og bygnaðarbroytingar á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum, sum landsstýrið við avtaluni frá 12. oktober 1992 hevur bundið seg til, og hvussu landsstýrið ætlar at seta hesar í verk.

Viðmerkingar:

Hin 18. mars 1994 reisti Niels Pauli Danielsen henda spurning í løgtinginum, og nakrar dagar seinni samtykti løgtingið, at Marita Petersen, táverandi løgmaður, skuldi svara hesum fyrispurningini.

Sjálvt um fyrispurningar smb. tingskipanini skulu verða "svaraðir á fundi seinast 10 dagar aftaná, at tingið hevur góðkent, at fyrispurningurin skal svarast", varð hesin týdningarmikli fyrispurningur ikki svaraður, tá ið løgtingið hin 19. mai 1994 samtykti at útskriva nýval, og øll tingmál tí duttu burtur.

Í nývalda løgtinginum reisti undirritaði Jákup Olsen fyrispurningin av nýggjum, men tá hendi tað løgna, at fleiri av tingmonnunum í landssstýrissamgonguni, ið var, ikki dámdu, at hesin fyrispurningur varð settur og tí ikki vildu atkvøða fyri, at hann varð svaraður. Tað restaðu nakrar heilt fáar atkvøður í. Eftir øllum at døma er hetta ein spurningur, ið kemur teimum illa við, ið gjørt hava avtalu við donsku stjórnina.
Men bæði nývalda løgtingið og alt Føroya fólk má haldast hava krav upp á at fáa at vita, hvat ið tað er, landsstýrið hin 12. oktober 1993 hevur bundið okkum til.
Tí verður spurningurin reistur sum uppskot til samtyktar, ið áleggur landsstýrinum at svara.

Í avtaluni, sum síðan 6. oktober 1992 eru gjørdar við donsku stjórnina, er tað eitt orð, sum alla tíðina gongur aftur og tí tykist hava stóran týdning. Tað er orðið "struktur" - "strukturrationaliseringer", sum sagt verður í teirri seinastu avtaluni frá 12. oktober 1993.

Sum úrslit av hesum avtalum hava vit tí síðan fingið samanleggingar í stórum tali. Samanlegging av fiskavirkjum, á landi, samanlegging av bankunum, samanlegging av fiskiskapinum og eina kvotuskipan, sum mest av øllum minnir um tað, teir søgdu farvæl til fyrrverandi kommunistisku londunum eytanfyri. Talað verður í álvara eisini um eina samanlegging av kommunum, og uppskot hava verið frammi um at leggja allar Føroyar saman í eitt valdømi.

Í teirri seinastu avtaluni við donsku stjórnina frá 12. oktober 1993 bindur landsstýrið og tepri samgongurmeirilutin á løgtigi seg til at fara undir bygnaðarbroytingar ("strukturrationaliseringer") og sparingar á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum frá fíggjarárinum 1995.

Tað eru bara 50 dagar eftir, til fíggjarárið 1995 byrjar. Tí má landsstýrið hava gjørt sær nakrar hugsanir um, hvar og hvussu ætlanin er at spara.

Er ætlanin at spara á heilsuøkinum við at avtaka stýrini fyri tey 3 sjúkrahúsini og leggja tey saman í eitt, so at farið kann verða undir eina samanlegging av sjúkrahúsunum og kanska niðurlogging av teimum smáu sjúkrahúsunum á sama hátt, sum bankarnir vórðu samanlagdir og annar teirra niðurlagdur, flakavirkini samanløgd og nøkur teirra niðurløgd o.s.fr.

Tað sama kann verða sagt um skúlaøkið. Er bygnaðarbroytingin har, at bygdaskúlar skulu verða niðurlagdir, og undirvísingin savnað á teimum størru skúlunum.
Hvør sparing er í tí? Hvussu ávirkar hetta bygdalívið og samfelagið alt?
Hvat er hugsað um við bygnaðarbroytingum á almannaøkinum?

Er hugsað um at draga alt, sum gevur nakað av sær, inná miðøkið, men samtíðis flyta teir sosialu trupulleikarnar út á bygdirnar, so at hitt almenna sleppur undan nøkrum av teimum útreiðslunum, ið standast av neyðini hjá fólki.

Samskiftisøkið verður eisini nevnt í avtalauni við donsku stjórnina.
Hvat er tað, ið har skal leggjast saman og sparast burtur? Er tað farleiðin hjá suðringum, sum síðsta landsstýrið ætlaði at leggja um Sandoynna. Ella farleiðin um Leirvíksfjørð fyri norðingar, sum longu er nógv niðurskorin, ella sambandið um Vestmannasund, sum eisini er skert. Fólk undrast, hvat ið ætlanin er, og summi ilskast. Samgonguskjalið hjá borgarligu landsstýrissamgonguni, sum undirskrivað var, hevði í hyggju at spara gjøgnum privatiseringar m.a. á samskiftisøkinum. Hetta vildi veitt eina bæði betri og bíligari tænastu. Men hvussu vil hetta landsstýrið spara? Við at minka um tænastuna og túratalið? Ella hvussu? Ongum er ókunnugt, hvørjir sorgarleikir, ið longu nú hava staðist av ógvusligu bygnaðarbroytingunum í samfelagi okkara, bæði fyri heim og familjur, bygdir og einstaklingar.

Stórt arbeiðsloysi og øgilig fólkaflyting er úrslitið av, at flakavirkini vórðu løgd saman, kvotuskipanini og broytingunum í fiskivinnuni, bankasamanleggingini v.m.
Tí er neyðugt at ávara móti fleiri stórum broytingum sama vegin.

Heldur eiga vit at fara undir at bøta um teir skaðarnar, kravdu broytingarnar longu nú hava elvt til og t.d. opna flakavirkini aftur, har einki arbeiði er.

1. viðgerð 24. november 1994. Málið var beint í fíggjarnevndina, sum 24. januar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 10. november 1994 og eftir 1. viðgerð tann 24. november 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zacharias-sen og Finnbogi Ísakson) vísir á, at uppskotsstillarin í viðmerkingunum til uppskotið spyr um ætlanir og sparingar í fíggjarárinum 1995. Meirilutin vísir á, at landsstýrið við fíggjarlógaruppskotinum 1995 hevur svarað teimum flestu av spurningunum, sum uppskotið snýr seg um. Síðani uppskotið er lagt fram, hava verið nýggjar samráðingar millum Føroya landsstýri og donsku ríkisstjórnina, har umrøddu spurningar eru við í "Fælleserklæring fra møde 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre". Meirilutin setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Bjarni Djurholm) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

2. viðgerð 27. januar 1995. Málið fall við 8-0 atkvøðum.

58 Ígildissetan fyri Føroyar av §§ 2 og 3 í uppskotinum til "Lov om ændring af retsplejeloven, lov for Færøerne om udgifterne i strafferetsplejen og lov for Færøerne om rettens pleje"

Ár 1994, hósdagin 10. november legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at setast kann í gildi fyri Føroyar §§ 2 og 3 í uppskotinum til "Lov om ændring af retsplejeloven, lov for Færøerne om udgifterne i strafferetsplejen og lov for Færøerne om rettens pleje".

Viðmerkingar:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at sett verður í gildi fyri Føroyar

1. broyting í lóg nr. 187 frá 7. juni 1958 fyri Føroyar um útreiðslurnar í straffirætturganginum, og
2. broyting í rættargangslógini fyri Føroyar, lóg nr. 92 frá 23. februar 1988.

ad 1: Sambært uppskotinum um broyting í lóg nr. 187 frá 7. juni 1958 verður § 5 í lógini strikað, soleiðis at skyldan at rinda fyri útreiðslur hjá teimum, sum sita av revsing, verður sett úr gildi.

§ 5 er soljóðandi:
"De udgifter, der medgår til underhold, forplejning og hjemsendelse af personer, der udstår straf af hæfte eller fængsel, herunder ungdomsfængsel og psykopatfængsel (straffelovens 17), samt personer, der hensidder i arbejdshus eller sikkerhedsforvaring (straffelovens § 67) henregnes til sagsomkostninger.

Samsvarandi lógargrein er sett úr gildi í Danmark við gildi frá 1. juni 1994, og verður tí skotið upp, at hetta eisini verður gildiskomudagurin fyri føroysku lógarbroytingini.

Løgmálaráðið metir, at lógarbroytingin fer at kosta ríkiskassanum uml. 100.000 kr. um árið.

ad 2: Broytingarnar í rættargangslógini fyri Føroyar eru neyðugar fyri, at rætturin í

Føroyum kann verða eitt tvey-dómaraembæti við umsitingarskipan, og var játtan fingin til ein dómara aftrat í donsku fíggjarlógini fyri 1994.

Hjálagt er:

1. Lóg nr. 187 frá 7. juni 1958 "for Færøerne om udgifterne i strafferetsplejen".
2. Skriv Løgmálaráðsins til ríkisumboðið dagfest 21. september 1994 og
3. uppskot Løgmálaráðsins til "Lov om ændring af retsplejeloven, lov for Færøerne om udgifterne i retsplejeloven og lov for Færøerne om rettens pleje" við viðmerkingum.

Viðmerkjast skal, at málið sambært løgmálaráðnum **hevur ein ávísan skund.**

1. viðgerð 23. november 1994. Málið var beint í rættarnevndina, sum 21. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 10. november 1994 og eftir 1. viðgerð 23. november 1994 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjøtt málið og hevur einmælt samtykt at taka undir við uppskotnu broytingunum.

2. viðgerð 6. januar 1995. Málið endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

59 Handilssáttmálar við Eysturríki og Sveis

Ár 1994, týsdag 22. november legði Edmund Joensen, løgmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir hjáløgdu sáttmálar ímillum ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri øðrumegin og ávikavist Eysturríki og Sveis hinumegin.

Viðmerkingar:
Føroyar hava í fríhandilssáttmálanum við EF bundið seg til at áleggja vørum við uppruna í triðjalondum serligan GATT-toll. Heimild er tó at taka av tollin á vørum við uppruna í teimum triðjalondum, sum Føroyar gera avtalur við um fríhandil.

Landsstýrið gjørdi m.a. av við tilvísing til omanfyri standandi at fara undir fríhandilssamráðingar við EFTA-lond. Undan samráðingunum vóru bert skipað viðurskifti fingin í lag við Finnland í einum stuttum sáttmála, har partarnir lova hvør øðrum ikki at gera mun á vørum við uppruna hjá hinum partinum og vørur við uppruna í EF. Sáttmálarnir við Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki eru góðkendir og nú sendir til kunngerðingar. Sáttmálarnir við Eysturríki og Sveis eru undirskrivaðir. Løgtingið hevur enn ikki góðkent sáttmálarnar, men arbeitt hevur verið eftir sáttmálunum eina tíð.

Føroyska samráðingarnevndin setti sær fyri undan samráðingunum at smíða sáttmálarnar við EFTA-lond eftir sama leisti sum sáttmálan við EF. Sambært hesum sáttmála hevur EF fullan fríhandil við ídnaðar-, fiska- og landbúnaðarvørum (tó mjólk og lambskjøt undantikin). Afturfyri fingu vit fullan fríhandil við teim landbúnaðarvørum, sum hava áhuga Føroya, ídnaðarvørur og fiskavørur, tó bert í ávísum nøgdum, tá talan er um viðkvom fiskasløg.

Føroyska samráðingarnevndin ynskti føroyskan kumuleringsrætt við EFTA (t.v.s. at tá ið føroyingar útflyta vørur av EFTA-uppruna, skulu tær verða jevnmettar við vørur við uppruna í Føroyum), og fult tollfrælsi fyri fiskavørur (t.v.s. ongar kvotur og ongi loft). Ístaðin fyri regluna í sáttmálanum við EF um at fiskavørur skulu hava fullan uppruna, varð skotið upp at nýta eina 50% reglu. Haraftrat varð skotið upp, at hvør parturin kann ikki virka við strangari útflutningstarnandi reglum enn hvør parturin mótvegis EF.

Við hesi orðingini var ætlanin at tryggja, at føroysk virki ikki standa seg verri enn virki í EF, tá EFTA-bátar (og tá serliga íslendskir) landa uttanlands. Hinvegin gevur orðingin møguleika fyri, at føroyingar hava reglur, sum tarna útflutningi av óvirkaðum fiski úr Føroyum, bert reglurnar ikki gera mun á útflutningi til EF og útflutningi til EFTA.

EFTA-londini ynsktu hinvegin, at sáttmálarnir skuldu verða teimum sáttmálum meira líkir, sum EFTA-londini í løtuni eru í ferð við at gera ella hava gjørt við triðjalond. Føroyska samráðingarnevndin gekk við til hetta, eftirsum tað í høvuðsheitum bert er formurin, sum skilir hesar sáttmálar frá sáttmálanum við EF. Tó eru í hesum sáttmálum eisini ásettar reglur um almennan einkarrætt, um vernd av ognarrættindum hugverka og um almenn innkeyp.

Annars gingu EFTA-londini í høvuðsheitum við til føroyska uppskotið. Sostatt fáa føroyingar sambært sáttmálunum kumuleringsrætt við EFTA og fullan fríhandil fyri fisk við heilt fáum undantøkum. Ynskið um eina 50% reglu fyri allar fiskavørur var gingið á møti fyri meirviðgjørdar vørur (kap. 16 í tollskránni), men ikki fyri fiskavørur sambært 3. kapitli.

Somuleiðis hildu EFTA-londini - Ísland undantikið - fast um, at sáttmálin skal áseta eitt treytað forboð fmóti útflutningstarnandi reglum, tó ikki í teim førum eini vinnugrein í stóran mun vantar rávøru til virkingar ("serious shortage").

Sáttmálarnir eru annars meinlíkir teimum við norðurlendsku EFTA-londini.

í komandi samráðingum við ESS um nýggjan sáttmála orsakað av víðkanini v.m. av Eysturríki er umráðandi, at vit kunnu vísa til
rættindi okkara í sáttmálum gjørdar við komandi EU limalond. **Biðið verður tí um skjóta viðgerð.**

1. viðgerð 29. november 1994. Málið var beint í marknaðarnevndina, sum 19. desember legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 22. november 1994 og eftir 1. viðgerð tann 29. november 1994 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri Føroya Arbeiðarafelag, Óla Jacobsen, landsstýrismann, Menningarstovuna og Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum fingu høvi til at gera viðmerkingar til sáttmálarnar.

Fyri Føroya Arbeiðarafelag møtti Elias Hansen. Nevndin spurdi um tey fyrivarni, sum Føroya Arbeiðarafelag hevði í samband við avtalurnar við Svørriki, Noreg, Ísland og Finnland. Tá mælti Føroya Arbeiðarafelag frá at hesir sáttmálar vórðu samtyktir við teirri grundgeving, at ein í hesum sáttmálum bant seg til ikki at veita fiskiivinnuni almennan stuðul og ikki at veita stuðul til arbeiðsskapandi tiltøk.

Føroya Arbeiðarafelag vísti á, at teir høvdu havt ov stutt skotbrá at viðgera handilsavtalurnar, men at tað tyktist, sum at hesir sáttmálar høvdu sama vandamál. Støða var kortini ikki tikin til, um Føroya Arbeiðarafelag fór at mæla løgtinginum frá at

samtykkja avtalurnar.

Óli Jacobsen, landsstýrismaður, vísti á, at bæði hesir sáttmálar eins og sáttmálarnir við Noreg, Ísland, Svøríki og Finnland góðtaka, at Føroyar áleggja sínari høvuðsvinnu - fiskivinnuni - harðari treytir enn tær treytir, sum ríki lond vit gera avtalur við leggja á sínar høvuðsvinnur. Tó metti Óli Jacobsen, at nú vóru ikki stundir til at broyta samráðingarurslitini, og at tað helst er neyðugt, at Føroyar hava avtalur við EFTA-londini Eysturríki og Sveis.

Fyri Menningarstovuna møtti Kjartan Kristianssen. Hann mælti løgtinginum til at samtykkja sáttmálarnar sum skjótast. Hesir sáttmálar veita so at siga fríhandil fyri allar fiskavørur upplýsti Kjartan Kristianssen, og hevur hetta stóran tydning, tá ið samráðast skal við ES um kompensatión fyri mist rættindi nú Eysturríki fer uppí ES. Viðvíkjandi spurninginum um at veita vinnuni stuðul, metti Kjartan Kristiansen ikki at hesar reglur vóru meira avmarkandi en reglurnar í ES-sáttmálanum.

Eisini Arne Poulsen mælti vegna Føroya Arbeiðsgevarafelag til, at løgtingið samtykkir sáttmálarnar sum skjótast. Føroya Arbeiðsgevarafelag metir at sátmálarnir eru góðir. Teir veita at kalla fullan fríhandil fyri fiskavørum og geva møguleika fyri, at vørur kunnu skifta uppruna sambært ávísum treytum. Arne Poulsen metti, at hetta høvi eisini átti at verið nýtt til tess at fáa betri handilsavtalu við ES - eina fult so góða avtalu sum hesar avtalurnar við Eysturríki og Sveis.

Grundað á hesi tilmæli og eftir at hava viðgjørt sáttmálarnar, mælir **ein sand marknaðarnevnd** løgtinginum til at samtykkja handilssáttmálarnar við Sveis og Eysturríki sum landsstýrið hevur lagt fyri tingið.

2. viðgerð 21. desember 1994. Málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

60 Viðvíkjandi "Fælleserklæring fra møde den 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre"

Ár 1994, mikudagin 23. november 1994 legði Tórður J. Niclasen, løgtingsmaður, vegna miðflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum at greiða løgtinginum nærri frá hjáløgdu "Fælleserklæring fra møde den 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre.

Viðmerkingar:

Í samband við samráðingarnar við danir 17. november 1994 sendi Miðflokkurin løgmanni skriv har m.a. varð sagt:

"Tá hugsað verður um týdningin av komandi samráðingum og hvørjar avliðingar tær koma at hava fyri alt føroyska fólkið, er tað at undrast yvir, at landsstýrið ikki tykist hava áhuga í, at andstøðan - og harvið alt løgtingið - verður við í samráðingum við danir!

Tað hevur kanska ongantíð verið meiri umráðandi enn júst nú, at samgonga og andstøða standa saman at finna loysnir til gagns fyri alt fólkið, ið her búleikast.

Tí verður hildið náttúrligt og vildi verið ein styrki í samráðingunum við danir, at umboð fyri andstøðuflokkarnar vóru við - og sum ein maður stóðu saman um tær avgerðir, ið takast skulu.."

Líknandi sjónarmið førir fólkatingsumboð sambandsfloksins eisini fram - honum til rós - har hesin í samrøðu við "Sosialin" 22. november 1994 verður endurgivin fyri at siga hesi skilaorð:

"Nú mega føroyingar standa saman sum ein maður uttan mun til politiskan lit. Tí hevði eg hildið, at tað hevði verið betur fyri okkum, at eisini umboð fyri andstøðuna komu til Danmarkar at fundast saman við landsstýrinum."

Landsstýrið tók ikki áheitan Miðfloksins til eftirtektar - og varð andstøðan ei heldur kunnað um samráðingarnar, fyrr enn danska stjórnin og Føroya landsstýri høvdu undirskrivað!

Hetta var sjálvadi hugstoytt, men ovboðið má tað sigast at vera, tá løgmaður nú alment boðar frá, at landsstýrið ikki ætlar at nevnda "avtala" skal fáa málsviðgerð í tinginum.

Andstøðan hevur longur alment gjørt viðmerkingar til avtaluna - og í tí sambandi reist ívaspurningar.

Løgið skal vera, um ikki eisini samgongulimir hugsa tað sama?
Henda sokallaða "Fælleserklæring" er stórmál, og eigur tí sjálvandi at fáa viðgerð á Føroya løgtingi.

Tí verður málið lagt fram, soleiðis at høvið verður hjá landsstýrinum longu undir 1. viðgerð at "notera" og viðmerkja spurningar avtaluni viðvíkjandi og um málið verður samtykt - eisini at handa tinginum skrivliga frágreiðing.'

1. viðgerð 2. desember 1994. Málið var beint í marknaðarnevndina, sum 2. februar 1995 legði soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum tann 23. november 1994 og eftir 1. viðgerð 2. december 1994 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið viðvíkjandi "Fælleserklæring fra møde den 17. november mellem regeringen og Færøernes landsstyre".

Til tess at lýsa gongdina í málinum nærri, bað marknaðarnevndin løgmann og Jalgrím Hilduberg, skrivstovustjóra í landsstýrinum koma á fund. Løgmaður greiddi frá, at umsiting landsstýrisins ikki metti, at yvirlýsingin frá seinasta samráðingarumfari millum Føroya landsstýri og donsku stjórnina skuldi leggjast fyri tingið sum serstakt mál, av tí at avtalan ikki skuldi samtykkjast á sama hátt sum í undanfarnum samráðingarumførum, tá ið lánheimild var treytað av, at løgtingið eisini góðtók avtalurnar. Landsstýrið gjørdi tí av at leggja yvirlýsingina fyri tingið í samband við lógaruppskot, sum vóru beinleiðis avleiðing av fundinum í november við donsku stjórnina. Tingið hevði sostatt høvi til at viðgera yvirlýsingina í samband við uppskot um heildarveitingina fyri 1995, løgtingsmál nr. 27/1994: Lóg um heildarveiting til Føroyar. Somuleiðis helt løgmaður, at løgtingið hevði havt høvi at viðgjørt nevndu avtalu undir fíggjarlógarviðgerðini, og so hvørt sum mál verða løgd fyri løgtingið, sum hava sín uppruna í teimum tingingum, sum fóru fram 17. november, fær tingið høvi at viðgera yvirlýsingina.

Løgmaður helt ikki, at landsstýrið í felagslýsingini hevur bundið løgtingið, men at tað

í hvørjum einstøkum føri er løgtingið sjálvt, sum skal gera av, um tað tekur undir við uppskotum landsstýrisins, eisini teimum, sum eru beinleiðis avleiðing av seinastu samráðingunum við dansku stjórnina.

Undir viðgerðini er marknaðarnevndin komin til ta niðurstøðu, at tað í løgtinginum kortini framvegis tykist at vera tørvur á at fáa eina neyvari frágreiðing um yvirlýsingina frá fundinum 17. november, og tekur **ein sand nevnd** tí undir við uppskotinum til samtyktar.

2. viðgerð 14. februar 1995. Málið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

61 Lántøka til stovnan av framtaksgrunni

Ár 1994, mánadagin 19. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>løgtingslóg um lántøku til landskassan.</u>	<u>lagtingslov om lån til landskassen.</u>
§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at læna 99 mió. kr. til at skjóta inn sum lán í ein framtaksgrunn.	**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån stort 99 mio. kr. til at indskyde som lån i et erhvervsudviklingsinstitut.
§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.	**§ 2.** Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í felagslýsingini frá 17. november 1994 millum dansku stjórnina og landsstýrið er avgjørt at stovna ein framtaksgrunn (Erhvervsudviklingsinstitut) við einum innskoti uppá 100 mió. kr. frá statinum og 100 mió. kr. frá føroyskari síðu.

Av innskotinum í grunnin skulu 2 x 99 mió. kr. vera rentu- og avdráttarfrí lán í 10 ár og 2 x 1 mió. kr. innskot sum stovnstæ.

Endamálið hjá framtaksgrunninum verður at veita eginpening til stovnan av nýggjum virkjum, víðkan av virkseminum á verandi virkjum ella endurstovnan av virkjum aftaná skuldarumlegging.

Landsstýrið hevur fingið tilboð frá Íleggingargrunninum fyri Føroyar um lán uppá 99 mió. kr. at afturrinda í einum ár 2004. Lánið verður rentufrít í 1995 og verður síðani at renta við somu nettorentuupphædd, sum Íleggingargrunnurin fær fyri innistandandi í peningastovnunum.

1. viðgerð 21. desember 1994. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. december 1994 og eftir 1. viðgerð 21. december 1994 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið tann 22. december 1994 og havt fund við løgmann, Edmund Joensen, landsstýrismenninar Jóannes Eidesgaard og Óla Jacobsen og við Jalgrím Hilduberg, skrivstovustjóra.

Á fundinum varð viðgjørd "Vedtægt for Færøernes Erhvervsudviklingsinstitut".

Uppskotið til viðtøkur var lisið upp og viðgjørt, grein fyri grein, og høvdu landsstýrisumboðini frágreiðingar til tær ymisku ásetingarnar og svaraðu spurninguni frá fíggjarnevndarumboðunum.

Eftir at umboðini fyri landsstýrið vóru farin av fundi, varð støða tikin til uppskot landsstýrisins, og tekur **ein meiriluti** (Finnbogi Argo, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariassen, Finnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen) undir við uppskoti landsstýrisins.

Annars var øll **fíggjarnevndin samd** um, at orðingin "Framtaksgrunnur" eigur at verða broytt til: "Framtaksstovnur", og setir samd fíggjarnevnd fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í staðin fyri heitið "Framtaksgrunnur" verður sett: "Framtaksstovnur".	1) Ingen ændring.
2) Í § 1 verður í staðin fyri "framtaksgrunn" sett: "framtaksstovn".	2) Ingen ændring.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar:

Eftir 1. viðgerð varð sagt frá, at tað hevði avgerandi týdning fyri støðutøkuna, at tað greitt framgangur av reglunum um játtanir veruliga koma vinnuni til góðar.

Eftir fundin í fíggjarnevndini við Edmund Joensen, løgmann, Jóannes Eidesgaard og Óla Jacobsen, landsstýrismenn, og Jalgrím Hilduberg, skrivstovustjóra, er spurningurin, hvussu endamálsgreinin skal skiljast, og hvørjar lánstreytirnar verða, líka ógreiður sum undir 1. viðgerð.

Løgmaður boðaði frá, at støða má takast til hetta málið, eftir krøvum frá donsku stjórnini beinanvegin, hóast reglugerðin enn ikki er endaliga góðkend.

Minnilutin kann ikki frá fyriliggjandi upplýsingum geva løgtinginum eitt nøkunlunda ummæli, hvørki fyri ella ímóti, út frá tí fyriliggjandi uppskoti til viðtøkur fyri grunnin.

Tó skal viðmerkjast, at endamálið í § 2 kann skiljast soleiðis, at peningur skal kanaliserast til monopolfyrritøku, tí her stendur, at pengingur kann latast til: "... erhversaktiviteter i virksomheder og projekter, ... som har gennemgået en væsentlig omstrukturering til gældsomlægning."

Hetta kann ikki vera meiningin við grunninum.

2. viðgerð 22. desember 1994. Málið varð beint aftur í fíggjarnevndina, sum 22. desember 1994 legði fram soljóðandi

Álit II

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður sett sum stk. 2: "Viðtøkurnar fyri framtaksstovnin skulu góðkennast av landsstýrinum og fíggjarnevnd løgtingsins".

I § 1 insættes som 2. stk.: "Vedtægterne for erhvervsudviklingsinstituttet skal godkendes af landsstyret og lagtingets finansudvalg".

3. viðgerð 22. desember 1994. Uppskotið soleiðis broytt endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lóg nr. 1 frá 3. januar 1995.

62 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1994, hósdagin 22. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 33 verður nr. 5 orðað soleiðis:

"a. um so er, at skattauppgerðin eitt ár vísir hall, kann hetta verða drigið frá í skattskyldugu inntøkuni 5 tey næstu árini, og soleiðis, at fyrsta árið verður alt hallið drigið frá, um inntøka er til tess og annars so nógv, sum inntøka er til. Hetta er fyrstu ferð galdandi fyri hall, sum er staðfest í roknskaparskeiði, sum fellur saman við ella endar í 1990.

b. Um so er, at hin skattskyldugi í inntøkuárinum 1995 ella seinni inntøkuárum fær eina neyðskuldarsemju ella skuldareftirgeving, ella avtala verður gjørd um sjálvboðna skuldarsemju, verður óbrúkt frádráttarbart hall frá avvarðandi og eldri inntøkuárum lækkað við somu upphædd, sum skuldin verður lækkað við. Lækkingarupphæddin verður minkað við tí skattskylduga inntøku-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86. af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 33 affattes nr. 5 således:

"a. såfremt den for et indtægtsår opgjorte skattepligtige indkomst udviser underskud, kan dette fradrages i den skattepligtige indkomst for de nærmest efterfølgende 5 indkomstår, således, at hele underskuddet fradrages det første år, såfremt det kan dækkes af indtægten dette år og ellers så stor en del, der er dækning for. Dette gælder første gang med virkning for underskud, som er konstateret i den regnskabsperiode, som falder sammen med eller slutter i 1990.

b. Hvis en skattepligtig i indkomståret 1995 eller i senere indkomstår opnår en tvangsakkord eller gældssanering eller frivillig akkord bliver aftalt, nedsættes uudnyttede fradragsberettigede underskud hidrørende fra det pågældende og tidligere indkomstår med sam-

parti skuldarans, sum stendst av frígivnu skuldarábyrgdini. Lækkingin er galdandi fyri tað inntøkuár, sum skuldareftirgevingin verður staðfest, úrskurður um neyðskuldarsemju verður gjørdur, ella avtala um sjálvboðna skuldarsemju verður gjørd, og fyri seinni inntøkuár. Um so er, at hall frá fleiri inntøkuárum skulu lækkast sambært pkt. 1 og 2, verður óbrúkt hall frá eldri árum lækkað áðrenn hall frá seinni árum.

c. Hall í sambandi við trotabúgv, gjaldsstøðg o.t. verður tó bert loyvt frádrigið í tann mun, skuldin ella partur av henni er goldin. Tann goldni parturin kann tá dragast frá í gjaldingarárinum."

2) Í § 33 verður sum nýtt nr. 14 sett: "í mesta lagi 3.000 kr. árliga av lønarútreiðslum í samband við viðlíkahald av egnum persónbili. Treytirnar fyri frádrátt eru, at bilurin einans verður nýttur privat, og at arbeiðið er gjørt av virki, ið er meirvirðisgjaldsskrásett sambært reglunum í løgtingslóg um meirvirðisgjald. Frádrátturin kann í mesta lagi vera 3.000 kr. árliga pr. akfar. Landsstýrið hevur heimild til við kunngerð at áseta nærri reglur fyri, hvat er at skilja við viðlíkahald, og fyri umsiting av hesum reglum".

3) Sum nýggj § 63 b verður sett: "**§ 63 b.** Av teirri løn, frítíðarløn, samsýning v.m. jbr. § 60, ið ein persónur, búfastur í Føroyum, ella eitt partafelag, fognarfelag, partsreiðarí, annar felagsskapur ella felag, skrásett í Føroyum, rindar persóni skattskyldugum í Føroyum, verður borið virkinum aftur, so sum

me beløb, hvormed gælden er nedsat. Nedsættelsesbeløbet formindskes med den del af skyldnerens skattepligtige indkomstandel, som hidrører fra den frigjorte gældsforpligtelse. Nedsættelsen sker med virkning for det indkomstår, hvori kendelse om gældssanering afsiges, tvangsakkord stadfæstes eller frivillig akkord er aftalt, og for senere indkomstår. Hvis underskud fra flere indkomstår skal nedsættes efter pkt. 1 og 2, nedsættes tidligere års underskud før senere års underskud.

c. Underskud i forbindelse med konkurs, betalingsstandsning og lignende, kan dog kun fradrages i det omfang, gælden eller dele af denne er betalt. Det således indbetalte beløb kan fradrages i det år, betalingen har fundet sted."

2) I § 33 indsættes som nyt nr. 14: "højst 3.000 kr. årligt af lønudgifter i forbindelse med vedligeholdelse af egen personbil. Betingelserne for fradrag er, at bilen kun anvendes privat, og at arbejdet er udført af en virksomhed, der er merværdisregistreret i henhold til reglerne i lagtingslov om merværdiafgift. Fradraget kan højst udgøre 3.000 kr. årligt pr. personbil. Landsstyret bemyndiges til i bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler for, hvad der skal forstås ved vedligeholdelse, og for administrationen af disse regler".

3) Som ny § 63 b indsættes: "**§ 63 b.** Af den løn, feriepenge, vederlag m.v. jfr. § 60, som en person bosiddende på Færøerne eller et aktieselskab, interessentselskab,

ásett er seinni í hesi grein, tó treytað av, at talan er um nýggja vinnu. Ein treyt fyri afturberingini er, at virkið hevur fast rakstrarstað í Føroyum, og at arbeiðið, ið treytar lønina, sum er grundarlag fyri afturberingini, er gjørt í Føroyum, ella umborð á skipi, skrásett í Føroyum, og har veruliga leiðslan er í Føroyum.

Stk. 2. Avgerð um, hvør vinna kann metast sum nýggj, verður tikin av nevnd við sakkønum fólki, sum landsstýrið velur. Avgerðin er endalig, og kann ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndulcika. Landsstýrið velur omanfyrinevndu nevnd, og ásetur við kunngerð neyvari reglur fyri virksemið hjá nevndini.

Stk. 3. Einaferð hvønn mánað ger Toll- og Skattstova Føroya upp tær útgjaldingar, hjá tí einstaka virkinum, sum tað hevur goldið gjøgnum afturhaldsskipanina fama mánað, og sum koma undir ásetingarnar í stk. 1. Føroya Gjaldstova flytir síðani síðst í mánaðinum tað ásetta prosentið, smb. stk. 4, av útgjaldingunum aftur til virkið.

Stk. 4. Árliga afturberingin eftir stk. 1 verður, í:

1995 28%
1996 28%
1997 21%

Stk. 5. Føroya Landsstýri kann við kunngerð áseta neyvari reglur um hvørt ein vinnuætlan kann metast sum nýggj, og umsiting og eftirlit viðvíkjandi afturberingini."

partsrederi, andre selskaber eller foreninger indregistreret på Færøerne, yder personer skattepligtige på Færøerne, tilbagebetales til virksomheden i henhold til bestemmelserne i denne paragraf, dog betinget af, at der er tale om et nyt erhverv. En betingelse for tilbagebetalingen er, at virksomheden har fast driftssted på Færøerne, og at det arbejde, der betinger den løn, som er grundlag for tilbagebetalingen, er udført på Færøerne, eller ombord på et skip, som er indregistreret på Færøerne, og hvor den faktiske ledelse foregår på Færøerne.

Stk. 2. Et sagkyndigt udvalg, som er nedsat af landstyret afgør, hvilke erhverv kan anses som nye. Afgørelsen er endelig, og kan ikke ankes til anden administrativ myndighed. Landsstyret nedsætter det ovenfor nævnte udvalg, og fastsætter i bekendtgørelse nærmere bestemmelser for udvalgets arbejde.

Stk. 3. Engang hver måned foretager Toll- og Skattstova Føroya en opgørelse over samtlige udbetalinger, som hver enkel virksomhed har anvist gennem indeholdelsessystemet den foregående måned, og som er omfattet af bestemmelserne i stk. 1. Siden overfører Føroya Gjaldstova i slutningen af måneden den fastsatte procentdel, jfr. stk. 4, af udbetalingerne tilbage til virksomheden.

Stk. 4. Den årlige tilbagebetaling efter stk. 1 bliver, i:

1995 28%
1996 28%
1997 21%

Stk. 5. Færøernes Landsstyre kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere bestemmelser om, hvilke erhvervsprojekter kann bedømmes som nye og administration og tilsyn ved-

rørende tilbagebetalingen."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1995. Broyting nr. 2 hevur bert gildi fyri 1995.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. jannar 1995. Ændring nr. 2 har kun gyldighed for 1995.

Viðmerkingar:

Viðmerkingar til einstøku broytingarnar:

ad 1): Uppskot Landsstýrisins ásetur, at um skattauppgerðin eitt ár vísir hall, sum ikki kann dragast frá tað árið, tí inntøka ikki er til tess, kann hetta verða drigið frá í skattskyldugu inntøkuni 5 tey næstu árini. Hesin rættur til framføring av halli kann ikki sambært núgaldandi lóg skerjast við mótrokning, um skuldareftirgeving fer fram.

Ein neyðskuldarsemja, skuldareftirgeving ella sjálvboðin skuldarsemja er sum útgangsstøði ikki skattskyldug fyri debitor. Hann verður ikki skattaður av eftirgivnu skuldini uttan so, at skuldareftirgevingin ikki er grundað í hansara vánaligu fíggjarstøðu og ringa gjaldføri.

At debitor hvørki verður skattaður av einari skuldareftirgeving, og at tað heldur ikki fær ávirkan á hansara møguligu hall fyri tað árið eftirgevingin fer fram, og hall frá árunum frammanunden, verður av kreditor mett, at geva kravi hansara móti debitor størri virði. Kravið hjá kreditor verður jú niðurskrivað til tað veruliga virðið tað hevur, tann dagin avgerð verður tikin um skuldareftirgeving. Kreditor metir um virðið av kravinum móti debitor, og við í hesari meting eru eisini skattaviðurskiftini hjá debitor. Minni hann skal gjalda í skatti betri gjaldføri hevur hann í framtíðini.

Sambært galdandi praksis, kemur metingin av, um debitor hevur fingið ein skattligan fyrimun av eini skuldareftirgeving ella ikki, at valdast hansara fíggjarligu viðurskifti á gjaldeftirgevingardegnum. Ein ítøkilig meting av fíggjarviðurskiftunum hjá vinnuvirkinum verður gjørd av líkningarvaldinum. Er líkningarvaldið komið til ta niðurstøðu, at kravið móti debitor er meira ella minni virðisleyst, hevur tað ikki ávirkað hansara skattskyldugu inntøku, og sambært galdandi lóg er ikki møguligt at mótrokna skuldareftirgevingina í ónýttum halli, sum í veruleikanum er tað, ið verður "sanerað".

Verður persónur, felag v.m. tikið undir trotabúgvaviðgerð ella fer í gjaldsteóg, so kann hall í hesum sambandi tó bert dragast frá, um skuldin verður goldin. Hendan skipan verður ikki broytt. Hetta hindrar tó ikki, at hall frá árum frammanunden trotabúgvaviðgerðini v.m. kann verða drigið frá, hóast so gott sum øll skuldin verður eftirgivin.

Hetta kann eisini bera í sær, at persónar og felløg, sum ár um ár hava havt hall av virkseminum, og tí fáa eftirgivið munandi skuld, harumframt eisini í fleiri ár verða skattafrír av upparbeiddu skuldini av akkumuleraðum hallum, sum teir/tey kanska bert gjalda ein lítlan part av ofta onki.

Um debitor kemur í trupulleikar og ikki kann gjalda, hvat ikki er ókent í dag, og hann tá vendir sær til kreditor fyri at fáa eina skipan, sum ofta snýr seg um at fáa eftirgivið stóran part av skuldini, verða skattligu viðurskiftini hjá debitor tikin við í einari samlaðari meting av støðuni hjá honum. Hevur hann tá hall, sum hann kann draga frá í nøkur ár, verður ein møgulig eftirgeving av skuld mett út frá hesum viðurskiftum. Kreditor metir hann betri gjaldføran, tí hann ikki skal gjalda skatt í eina tíð framyvir. Við øðrum orðum, so endar partur av skuldini óbeinleiðis at verða goldin av lands- og kommunukassanum.

Skotið verður tí upp at broyta hesar regiur soleiðis, at um hin skattskyldugi fær eina neyðskuldarsemju (tvangsakkord), skuldareftirgeving (gældsanering) ella sjálvboðna skuldarsemju (frivillig akkord), so ber hetta í sær, at tann parturin av skuldini, sum verður eftirgivin v.m., skal mótroknast í halli, sum ikki er drigið frá frammanundan bæði frá inniverandi og eldri inntøkuárum.

Mótrokningin í halli kann gerast bæði í staðfestum halli tað árið neyðskuldarsemja, skuldareftirgeving ella sjálvboðin semja er gjørd og í halli frá eldri árum, sum ikki er nýtt í byrjanini av skuldareftirgevingarárinum.

Ætlanin er ikki at henda lógarbroyting skal ávirka gjørdar avtalur um "sanering". Broytingin fær tí onga ávirkan á gjørdar avtalur, men skal bert umfata avtalur um "sanering", sum verða gjørdar í 1995 og seinni. Avtalur, sum eru gjørdar í 1994, og árini frammanunden, og sum eftir galdandi lóg ikki eru mótroknaðar í ikki nýttum halli frá avtaluárinum og árunum frammanundan, verða ikki ávirkaðar av broytingini. Um ein slík fyrr gjørd avtala verður broytt í 1995 ella seinni, soleiðis at nýggj "sanering" verður gjørd, verður lógarbroytingin tá gjørd galdandi. Hevur persónurin, felagið v.m. tá hall, sum ikki er nýtt til mótrokning í inntøku, verður eftirgivin skuld mótroknað í resthallinum.

Um hall frá fleiri inntøkuárum skulu lækkast, verður hall frá eldri árum lækkað fyrst.

Skuldarlækkingin verður gjørd upp sum munurin millum áljóðandi skuld og niðurskrivaða virði av áljóðandi skuld aftaná neyðskuldarsemja, skuldareftirgeving ella sjálvboðin skuldarsemja er fingin í lag. Um skattskyldug inntøka stendst av "saneringini", skal hon dragast frá lækkingarupphæddini, sum skal mótroknast í halli.

ad 2): Fyri at minka um insitamentið at arbeiða svart og fyri at lætta eitt sindur um skattatrýstið hjá vanliga skattaborgaranum og fyri at økja um virksemið í samfelagnum, hevur landsstýrið gjørt uppskot um frádrátt fyri skattaárið 1995 fyri umvælingar av persónbilum.

Frádráttur in verður uppá 3.000 krónur, og landsstýrið metir, at tiltakið fer at kosta lanskassanum 7,5 mió. kr. Henda meting er grundað á tað fyritreyt, at meginparturin av øllum persónbilum gera nýtslu av frádráttinum og at áleið helvtin av øllum umvælingunum álíkavæl høvdu verið gjørdar á mvg-skrásettum verkstað, sjálvt um eingin frádráttur var.

Eins og sethúsafrádrátturin er hesin frádráttur treytaður av, at umvælingin verður gjørd av MVG-skrásettum virki, men í samband við umvælingar av bilum verður frádráttur einans givin fyri lønarpartin av umvælingini. Eisini er tað ein treyt, at bilurin einans verður nýttur privat.

Frádráttur	3.000	4.000
Meira skattskyldug inntøka	1.500	2.000
	1.500	2.000
Við 60% marginal	900	1.200
Meira MVG (25% av 1.500 og 2.000)	375	500
	525	700
11.000 bilar	5,8 mió.	7,7 mió.

ad 3): Hin 27. sept. 1994 setti landsstýri ein arbeiðsbólk, ið m.a. skuldi kanna og gera tilmæli um skattaendurgjald fyri nýggjar vinnuætlanir, sum eitt av tiltøkunum í samband við arbeiðsskapandi politik landsstýrisins.

Hetta uppskot landsstýrisins viðvíkur sum sagt eina afturbering av lønarútreiðslunum til løngjaldaran, og skotið er upp, at afturberingin verður tíðaravmarkað í 3 ár, soleiðis at árliga afturberingin í

1995 verður 28%
1996 verður 28%
1997 verður 21%

Treytin fyri at koma undir hesa skipan er, at talan er um nýggja vinnu, og trupulleikar koma at verða um, hvussu hetta skal definerast. Tí verður skotið upp, at landsstýrið setir nevnd við sakkønum fólki, ið tekur avgerð um, hvørt vinnætlan kann metast sum nýggj. Avgerðirnar eru endaligar, og kunnu sostatt ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. Afturberingin fer fram eina ferð hvønn mánað.

Landsstyrið metir, eins og tað er skotið upp í álitinum um arbeiðsskapandi politik, at nýggjar vinnur skulu hava hesi eyðkenni:

1) Heilt ella lutvíst útflutningsfremjandi virksemi, tá tað fyrst og fremst er her, tørvur er á stuðli.
2) Kappast ikki um marknað og rávøru við verandi virksemi.
   Viðvíkjandi marknað so skal ansast eftir, at kappingaravlaging hvørki fer fram á føroyska ella útlendska marknaðinum.
   Viðvíkjandi kapping um rávøru, so er týdningarmikið, at nýggja virksemið ikki avlagar kappingina um rávøruna, sum verandi virki virkar burtur úr, soleiðis at úrslitið av nýggja virkseminum bert er ein flyting av arbeiðsplássum frá gomlu virkjunum yvir til nýggja virksemið. Hinvegin kann onkur nýggj framleiðsla metast at vera eitt slíkt frambrot, so at kappingin um rávøruna er so lítið avlagandi, at mett verður rætt at lata virksemið koma undir nýggja skipanin.
3) Framleiða nýggjar vørur og tænastur. Her kann t.d. nevnast. framleiðsla, sum fyrr bert hevur verið framleidd til heimamarknaðin, men sum nú eisini skal

útflytast, framleiðsla, sum er grundað á eitt nýtt koncept, vøruframleiðsla, sum er grundað á nýggja rávøru, ella at kend rávøra verður útvegað, so at hon ikki er í kapping við verandi rávøru.

Neyðugt verður at seta nærri reglur um eftirlit við skipanini, fyri at tryggja, at nýggja virksemið bert fær endurgjald til lønir, sum veruliga fara til nýggja virksemið. Tí verður skoti upp, at kunngerð um umsiting og eftirlit skal gerast, har nærri treytir verða settar í samband við útgjaldingini av afturberingini.

Treytirnar fyri útgjaldingina eru:

- At serskildur roknskapur verður gjørdur fyri virksemið, ið fer endurgjald.
- At viðkomandi virki fult út lýkur tey krøv, ið sett verða til roknskap og bókhald í roknskaparlógini og í kunngerð um minstukrøv til bókhald og roknskap.
- At arbeiðsseðlar eru til skjals, ið vísa, hvat arbeitt hevur verið við hvønn dag. Hesir seðlar verða váttaðir av arbeiðsleiðara og løntakara.
- Virksemið fær loypandi endurgjald, t.d. hvønn mánaða sambært váttan frá løggildum grannskoðara.

Vísast skal eisini til álitið um arbeiðsskapandi politik, ið arbeiðsbólkurin, sum landsstýrið setti 27.09.1994, hevur skrivað.

Samgongan og landsstýrið hava sett sær fyri at fremja ein miðvísan politikk at skapa karmar fyri útvegan av fleiri arbeiðsplássum. Hetta verður gjørt í ásannan av, at útvegan av produktivum arbeiðsplássum er einasti vegur burtur úr verandi støðuni hjá okkara samfelagi og teimum trupulleikum, sum samfelagið og tess borgarar hava at dragast við.

Landsstýrið ivast ikki í, at ein slíkur politikkur kann fara at eydnast. Tað er alment kunnugt, at vit eiga fleiri ótroyttar møguleikar at útvega samfelagnum fleiri inntøkur. Hetta er serstakliga galdandi innan fiskiveiðu og fiskatilvirking. Men vit hava ábendingar um, at vit kanska eisini hava vinnuligar møguleikar á øðrum økjum enn við fiskivinnuni.

Tað "einasta", sum skal til, er at skapa fyritreytir fyri, at allir hesir møguleikar kunnu troytast. Her hevur landsstýrið fleiri ætlanir, men hetta uppskotið er ein partur av hesi ætlan. Uppskotið gevur arbeiðsgevarum eitt ískoyti til lønarútreiðslurnar fram til 1997, tá talan er um nýggjar vinnur. Mett verður, at hesin stuðul til nýggjar vinnur fer, saman við øðrum tiltøkum, gera sítt til at skunda undir, at slíkar koma í gongd

Hetta er ein studningsskipan, sum ikki nýtist at koma á fíggjarlógina. Roknað verður nevniliga við, at í tann mun, sum skipanin fer at virka fer hon nevniliga at geva avkast til fíggjarlógina, tí afturberingin til arbeiðsgevaran er hóast alt minni enn samlaði skatturin.

1. viðgerð 2. januar 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 19. januar 1995 legði fram soljóðandi

Á lit

Málið varð lagt fram tann 22. desember 1994, og aftaná fyrstu viðgerð tann 2. januar 1995 varð málið beint í skattanevdina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og í hesum sambandi hevur nevndin havt fund við umboð fyri Toll & Skattstovu Føroya.

Nevndin staðfestir, at í § 33, nr. 5, eru litra a og c óbroytt í mun til núgaldandi reglur.

§ 33, nr. 5, litra a, heimilar skattgjaldara, ið hevur hall, at draga hetta frá í skattskyldugu inntøkuni 5 tey næstu árini.

§ 33, nr. 5, litra c, er ein avmarking av § 33, nr. 5, litra a. Reglan ásetir, at um skattgjaldari hevur hall í sambandi við trotabúgv og gjaldsstøðg, skal hallið verða goldið, áðrenn hallið kann dragast frá.

Tað nýggja í uppskoti landsstýrisins er § 33, nr. 5, litra b, ið ásetir, at í førum, tá ið skuldari fær skuldarsemju, verður óbrúkt frádráttarbart hall frá árunum frammanundan, skuldarsemjuni ella sama ári, lækkað við somu upphædd, sum skuldin verður lækkað við.

Broytingin hevur við sær, at hereftir verður ikki møguligt at draga hall frá, ið ikki skal gjaldast.

Uppskot landsstýrisins um at seta inn nýtt nr. 14 í § 33, viðvíkur frádrátti fyri lønarútreiðslur í sambandi við viðlíkahald av egnum persónbili. Ein treyt fyri frádráttinum er, at bilurin einans verður nýttur privat, t.v.s. at reglan fevnir bert um bilar, ið ikki verða avskrivaðir heilt ella partvís sambært reglunum í avskrivingarlógini.

Í pkt. 3 í landsstýrisins uppskoti verður skotið upp, at virki, ið fara undir nýggja vinnu kunnu fáa part av lønarútreiðslunum í sambandi við nýggju vinnuna endurgoldnar.

Nevndin heldur tað ikki vera rætt at áseta reglur um afturbering av løn til nýggjar vinnur í skattalógini. Talan er um studning til nýtt virksemi. Reglur um hetta eiga tí at verða ásettar í serligari lóg.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við stjóran á Toll- og Skattstovu Føroya, fíggjarstjóran í landsstýrinum, fiskivinnustjóran í landsstýrinum og landsgrannskoðaran. Upp á fyrispurning frá nevndini greiddi fiskivinnustjórin í landsstýrinum frá, at reglan um at veita stuðul til nýggj virki ikki gongur í móti reglunum á hesum øki hjá ES. Stjórin greiddi frá, at reglurnar hjá ES ikki forða fyri at geva stuðul til smærri virkir. Dømi er við sokallaðum "fgongdsetarastuðli" í ES.

Upp á fyrispurning svaraði fíggjarstjórin í landsstýrinum, at tað er sera torført at siga,

hvussu nógv skipanin fer at kosta landskassanum.

Stjórin á Toll- og Skattstovuni greiddi frá, at tað ikki er trupult hjá Toll- og Skattstovuni at geva tær upplýsingar, ið sambært uppskotinum eru neyðugar.

Ein samd skattanevnd setir fram hetta

Broytingaruppskot

Í § 1 í uppskoti landsstýrisins verður nr. 3 strikað.

I § 1 i landsstyrets forslag udgår nr. 3.

Annars mælir nevndin til, at uppskot landsstýrisins verður samtykt og setir harumframt soljóðandi

Uppskot

til

<u>løgtingslóg um stuðul til nýggjar vinnur</u>.

<u>§ 1.</u> Av teirri løn, fritíðarløn, samsýning v.m., jbr. § 60 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, ið ein persónur, búfastur í Føroyum, ella eitt partafelag, fognarfelag, partsreiðarí, annar felagsskapur ella felag, skrásett í Føroyum, rindar persóni, skattskyldugum í Føroyum, verður veittur virkinum studningur, so sum ásett er seinni í hesi grein, tó treytað av, at talan er um nýggja vinnu. Ein treyt fyri studninginum er, at virki hevur fast rakstrarstað í Føroyum, og at arbeiðið, ið treytar lønina, sum er grundarlag fyri studninginum, er gjørt í Føroyum, ella umborð á skipi, skrásett í Føroyum, og har veruliga leiðslan er í Føroyum.

Stk. 2. Avgerð um, hvør vinna kann metast sum nýggj, verður tikin av 3-mannanevnd við sakkønum fólki, sum landsstýrið velur. Avgerðin er endalig, og kann ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. Landsstýrið ásetir við kunn-

<u>lagtingslov om tilskud til nye erhverv</u>.

<u>§ 1.</u> Af den løn, feriepenge, vederlag m.v., jfr. § 60 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer, som en person, bosiddende på Færøerne, eller et aktieselskab, interessentselskab, andelsrederi, andre selskaber eller foreninger indregistreret på Færøerne, yder personer, skattepligtige på Færøerne, tilbagebetales til virksomheden i henhold til bestemmelserne i denne paragraf, dog betinget af, at der er tale om et nyt erhverv. En betingelse for støtten er, at virksomheden har fast driftssted på Færøerne, og at det arbejde, der betinger den løn, som er grundlag for tilbagebetalingen, er udført på Færøerne, eller ombord på et skib, som er indregistreret på Færøerne, og hvor den faktiske ledelse foregår på Færøerne.

Stk. 2. Bestemmelse om, hvilke erhverv kan defineres som nye, tages af et 3-mandsudvalg med sagkyndige folk, som er nedsat af landsstyret. Afgørelsen er ende-

gerð neyvari reglur fyri virkseminum hjá nevndini.

Stk. 3. Einaferð hvønn mánað ger Toll- og Skattstova Føroya upp tær lønarútgjaldingar, sum tað einstaka virkið hevur goldið gjøgnum afturhalds-skipanina undanfarna mánaðin, og sum koma undir ásetingarnar í stk. 1. Føroya Gjaldstova flytur síðani síðst í mánaðinum tað ásetta prosentið, smb. stk. 4, av útgjaldingunum aftur til virkið.

Stk. 4. Árligi studningurin eftir stk. 1 verður:

Frá 1. apríl 1995 til 31. mars 1996: 28%.
Frá 1. apríl 1996 til 31. mars 1997: 28%.
Frá 1. apríl 1997 til 31. mars 1998: 21%.

Stk. 5. Føroya landsstýri setir við kunngerð neyvari reglur um umsiting og eftirlit viðvikjandi studninginum.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

lig, og kan ikke ankes til anden administrativ myndighed. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere bestemmelser for udvalgets arbejde.

Stk. 3. Engang hver måned foretager Toll- og Skattstova Føroya en opgørelse over samtlige lønudbetalinger, som hver enkelt virksomhed har anvist gennem indeholdelsessystemet den foregående måned, og som er omfattet af bestemmelserne i stk. 1. Siden overfører Føroya Gjaldstova i slutningen af måneden den fastsatte procentdel, jfr. stk. 4, af udbetalingerne tilbage til virksomheden.

Stk. 4. Den årlige støtten efter stk. 1 bliver:

Fra 1. april 1996 til 31. marts 1996: 28%.
Fra 1. april 1996 til 31. marts 1998: 28%.
Fra 1. april 1997 til 31. marts 1998: 21%.

Stk. 5. Færøernes landsstyre fastsætter med bekendtgørelse nærmere om administration og tilsyn vedrørende støtten.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Jørgen Niclasen tekur eftir umstøðunum undir við uppskoti landsstýrisins, men hevur hesar viðmerkingar um skattaendurgjald fyri nýggjar vinnuætlanir.

Síðan 1989 hevur fólkaflokkurin víst á tað skaðiliga í at lækka kostnaðarstøðið fyri at fáa lønsemi aftur í samfelagið. Hóast tað hevur verið tungt at fingið ljóð fyri hesum, eru tað fleiri og fleiri, ið ásanna tað neyðuga í hesum. Tó tykist landsstýrið bert at taka ein part í senn, og hesa ferð eru tað nýggjar vinnur, ið roynd verður gjørd at fáa lønsamar.

Landskassin brúkar ov nógv í mun til inntøkurnar, vinnulívið skal gjalda ov nógv, meðan lønin er góð, men fólkið fær einki av henni.

Landskassin brúkar ov nógv í mun til inntøkurnar, vinnulívið skal gjalda ov nógv, meðan lønin er góð, men fólkið fær einki av henni. Lønsemið í øllum samfelagnum er avskeplað.

Í staðin fyri at lekja sjúklingin, ger landsstýrið fleiri royndir at lekja symptomini, og tað er hóast alt ein bati, sum vónandi til endans fær lekjaran at gera tað neyðuga.

Kostnaðarstøðið fyri fiskiskip er ov høgt, og tí verður latin íløgustuðul. At framleiða úr frystum fiski er ov dýrt, og tí verður har latin kilostuðul. At byggja hús er ov dýrt, og tí verður latin rentufrádráttur. Umvæling av húsum og nú eisini av bilum er staðfest ov kostnaðarmikið, og letur landskassin frá-drátt í skattinum til hesi endamál, og nú standa nýggjar vinnur fyri tørni. Soleiðis kundi ein hildið fram við stuðulshættum, sum eru til, tí politikkarar hava staðfest, at kostnaðarstøðið í samfelagnum er ov høgt.

Framvegis eru neyðlíðandi vinnur, sum ikki sleppa undir eina kostnaðarstøðislækking. Ein stórur partur av hesum hevur fyri neyðini eina lækking, um tey arbeiðsplássini ikki eisini skulu fara fyri bakka.

Tann stóri trupulleikin við hesum uppskotinum er, hvussu ein nýggj vinna skal definerast. Undir nevndarviðgerðini er upplýst, at ómøguligt er at gera nágreinilligar reglur um, hvat ein nýggj vinna er, men at avgerð um, hvør vinna kann metast sum nýggj, verður tikin av nevnd við sakkønum fólki, sum landsstýrið velur, og avgerð nevndarinnar kann ikki kærast. Tað verður tí upp til nevndina, hvussu henda lóg kemur at virka.

At tað verður trupult at avgera, hvør kemur undir nýggja vinnu, kom best fram undir nevndarviðgerðini, tá tveir limir úr arbeiðsbólkinum, ið skrivaðu álit um arbeiðsskapandi politikk, úttalaðu seg. Annar segði, at markið millum nýggjar og gamlar vinnur verður ein "ræðuligur trupulleiki". Upp á spurning frá nevndarlimum, um klippfiskur var nýggj vinna, svaraðu báðir ja, men um 5 virki fóru undir at framleiða klippfisk, svaraði annar, at so fáa vit 80-ini umaftur, meðan hin segði, at tá máttu allir koma undir skipanina. At tað er trupult at seta markið, er eyðsýnt.

Tað eru tríggir møguleikar at áseta markið:
1. at nevndin verður afturhaldin, og mest sum einki kemur burturúr,
2. at nevndin ikki verður afturhaldin, og mest sum alt kemur undir, ella
3. at nevndin finnur ein millumveg.

Nevndin fer ivaleyst at leggja seg eftir at finna millumvegin, men tá er vandi fyri ónøgd og kanska eisini órættvísi, nevniliga at hesin sleppur undir og hasin ikki.

Hetta uppskotið er sum áður nevnt ein ásannan av, at kostnaðarstøðið er ov høgt, men røkkur hert fyri ávís virkir. Hetta hjálpir munandi um hjá summum, og út frá tí heldur at hjálpa summum enn ongum at hjálpa verður mælt til at samtykkja uppskot landsstýrisins við teirri vón, at kostnaðarstøðið verður lagað til alt samfelagið innan alt ov langa tíð.

2. viðgerð 24. januar 1995. Uppskot landsstýrisins sum broytt av meirilutanum samtykt við 30-0 atkvøðum. Uppskot meirilutans til løgtingslóg samtykt við 29-0 atkvøðum.

3. viðgerð 27. januar 1995. Málið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lógir nr. 16 og 17 frá 1. februar 1995.

63 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m.

Ár 1994, hósdagin 22. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992 um skrásetingargjald á motorakfør v. m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 1 verða orðini "og eitt vektgjald" strikað.
2) § 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2.** Tað avgjaldsskylduga virðið á einum nýggjum akfari við allari vanligari útgerð og eykaútgerð er søluprísurin íroknað meirvirðisgjald, men ikki íroknað avgjald eftir hesi lóg, við sølu her í landinum, táið skrásetingin fer fram.

Stk. 2. Fyri akfør, ið hava verið á goymslu hjá bilasølu í meira enn eitt ár verður heimilað at lækka virðisgrundarlagið við 10% fyri hvørt byrjað ár, tó ongantíð við meira enn 30%.

Stk. 3. Í førum har talan ikki er um vanligar søluumstøður, t.d. tá ið seljarin hevur fíggjarligan áhuga í virksemi ella ogn keyparans, kann tollvaldið áscta virðisgrundarlagið soleiðis, at hetta fevnir tey gjøld og útreiðslur, ið skulu innganga í virðisgrundarlagið sambært stk. 1.

Stk. 4. Í førum har motorakfør verða innflutt av privatum, felløgum,

lagtingslov om ændring i lagtingslov omregistreringsafgift af motorkøretøjer m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 175 af 18. december 1992 om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v. foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 1 udgår ordene "værdi- og vægtafgift" og istedet indsættes: "værdiafgift".
2) § 2 affattes således:

"**§ 2.** Den afgiftspligtige værdi for et nyt køretøj, iberegnet standardudstyr og ekstraudstyr, er salgspris, indbefattet merværdiafgift, men uden afgift efter denne lov, ved salg til bruger her i landet på registreringstidspunktet.

Stk. 2. For køretøjer, der har været på lager hos bilforhandler i over et år, hjemles der en nedsættelse af værdigrundlaget med 10% for hvert påbegyndt år, dog aldrig mere end 30%.

Stk. 3. I tilfælde, hvor salgsomstændighederne ikke er som sædvanligt, f.eks. når sælger og køber er samme person, eller når sælger har økonomisk interesse i købers virksomhed eller formue, kan toldmyndighederne fastsætte værdigrundlaget således, at dette omfatter de afgifter og udgifter, der i henhold til stk. 1

ella stovnum, kann tollvaldið ásetta virðisgrundarlagið sambært stk. 1 og 2."

3) § 3 verður orðað soleiðis:

"§ 3. Persónvognar.

Virðisgjald:

Kr. 80.000 og undir, 40%, tó ongantíð minni enn kr. 10.000.

Yvir 80.000 kr. kr. 32.000 av kr. 80.000 og 60% av restini."

4) § 4 verður orðað soleiðis:

"§ 4. Hýru- og skúlavognar.

Virðisgjald: Einki.

Stk. 2. Skrásetting sum hýru- ella skúlavognur er treytað av loyvi frá Føroya Landsstýri ella myndugleika, ið Landsstýrið heimilar at fyrisita hesi loyvir.

Stk. 3. Verður hýru- ella skúlavognur skrásettur sum persónvognur áðrenn 4 ár (48 mánaðir), verður skrásetingargjald fyri persónvognar goldið eftir hesi lóg luttalsliga svarandi til tíðina, sum restar í teimum 48 mánaðunum.

Stk. 4. Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at seta reglur um koyrdar kilometrar, innkoyring, umskráseting o.a., sum skjalprógv fyri, at akfarið hevur verið nýtt sum hýru- ella skúlavognur.

Stk. 5. Verður hýru- ella skúlavognur seldur til sama vinnuliga endamál, skal keyparin hava loyvi sambært stk. 2."

5) § 5 verður orðað soleiðis:

"§ 5. Vøruvognar av skapi og merki sum persónvognar:

Virðisgjald: 20%.

Stk. 2. Verður vøruvognur umskrásettur til persónvogn, skal munurin á virðisgjaldinum rindast landskassanum."

6) § 6 verður orðað soleiðis:

"§ 6. Bussar til 10 persónar ella fleiri, førarin íroknaður.

indgår i værdigrundlaget.

Stk. 4. I tilfælde, hvor motorkøretøjer importeres af private, foreninger, eller institutioner, kan toldmyndighederne fastsætte værdigrundlaget i henhold til stk. 1 og 2."

3) § 3 affattes således:

"§ 3. Personmotorkøretøjer.

Værdiafgift:

Kr. 80.000 og derunder, 40%, dog altid mindst 10.000 kr.

Over kr. 80.000 kr. 32.000 af kr. 80.000 og 60% af resten."

4) § 4 affattes således:

"§ 4. Hyre- og skolevogne.

Værdiafgift: Ingen.

Stk. 2. Registrering som hyrevogn eller skolevogn er betinget af tilladelse fra Færøernes Landsstyre eller myndighed, som Landsstyret bemyndiger til at administrere disse tilladelser.

Stk. 3. Såfremt hyre- eller skolevogne registreres som personvogn før 4 år (48 måneder), betales registreringsafgift for personvogne delvis i overensstemmelse med den tid, der mangler af de 48 måneder.

Stk. 4. Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at fastsætte regler om kørte kilometer, indkøring, omregistrering o.a. som dokumentation for, at køretøjet har været benyttet som hyre- eller skolevogn."

Stk. 5. Såfremt hyre- eller skolevogn sælges til samme erhvervsmæssige formål, skal køber have tilladelse i henhold til stk. 2."

5) § 5 affattes således:

"§ 5. Varevogne af type og fabrikat som personvogne

Værdiafgift: 20%.

Stk. 2. Såfremt en varevogn omregistreres til en personvogn, skal forskellen af værdiafgiften betales landskassen."

Virðisgjald: Einki."

7) § 7 verður orðað soleiðis:
"§ **7.** Dragivognar (traktorar) til leguvognar.
Virðisgjald: Einki."

8) § 8 verður orðað soleiðis:
"**§ 8.** Last- og vøruvognar, dumparar og leguvognar. Støðd eftir totalvekt.
Virðisgjald:
3.500 kg og undir: 10%
yvir 3.500 kg: Einki."

9) § 9 verður orðað soleiðis:
"**§ 9.** Avlamisvognar.
Virðisgjald: Einki."

10) § 10 verður orðað soleiðis:
"**§ 10.** Neyðsendaraakfør og lík-vognar.
Virðisgjald: Einki."

11) § 11 verður orðað soleiðis:
"**§ 11.** Motorsúkklur.
Virðisgjald: 100%".

12) § 12 verður orðað soleiðis:
"**§ 12.** Campingvognar.
Virðisgjald: 30%".

13) § 13 verður orðað soleiðis:
"**§ 13.** Viðfestivognar við sløkki-útgerð.
Virðisgjald: Einki."

14) § 14 verður orðað soleiðis:
"**§ 14.** Aðrir viðfestivognar.
Virðisgjald: Einki".

15) § 15 verður orðað soleiðis:
"**§ 15.** Brúkt motorakfør. Fyri motorakfør, ið hava verið endaliga skrásett í útlondum í minni enn 1 ár, er skrásetingargjaldið 90% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.
Stk. 2. Hevur motorakfarið verið endaliga skrásett í útlondum úr 1 upp í 5 ár, er skrásetingargjaldið 70% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.
Stk. 3. Í førum har motorakfarið hevur verið endaliga skrásett í útlondum í 5 ár ella longri, er skráset-

6) § 6 affattes således:
"**§ 6.** Busser til 10 personer og derover, føreren iberegnet.
Værdiafgift: Ingen."

7) § 7 affattes således:
"**§ 7.** Slæbevogne (traktorer) til sættevogne.
Værdiafgift: Ingen."

8) § 8 affattes således:
"**§ 8.** Last- og varevogne, dumpers og sættevogne.
Størrelse efter totalvægt.
Værdiafgift:
3.500 kg og mindre: 10%
mere end 3.500 kg: Ingen."

9) § 9 affattes således:
"**§ 9.** Invalidevogne.
Værdiafgift: Ingen."

10) § 10 affattes således:
"**§ 10.** Udrykningskørretøjer og rustvogne.
Værdiafgift: Ingen."

11) § 11 affattes således:
"**§ 11.** Motorcykler.
Værdiafgift: 100%".

12) § 12 affattes således:
"**§ 12.** Campingvogne.
Værdiafgift: 30%".

13) § 13 affattes således:
"**§ 13.** Påhængsvogne med brandslukningsudstyr.
Værdiafgift: Ingen."

14) § 14 affattes således:
"**§ 14.** Andre påhængsvogne.
Værdiafgift: Ingen".

15) § 15 affattes således:
"**§ 15.** Brugte motorkøretøjer.
For brugte motorkøretøjer, der har været registreret i udlandet i mindre end 1 år, er registreringsafgiften 90% af registreringsafgiften for tilsvarende nyt køretøj.
Stk. 2. Såfremt motorkøretøjet har været registreret i udlandet fra 1 til 5 år, er registreringsafgiften 70% af registreringsafgiften for tilsvarende

ingargjaldið 50% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar."

16) § 18, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 3.** Skrásetingargjaldið kann tó ongantíð verða lægri enn 30% av virðisgjaldinum fyri sama akfar sum nýtt."

17) § 27, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 4.** Føroya Gjaldstova kann innheinta bøtur og fallið skrásetingargjald eftir hesi lóg við panting."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd, og er galdandi fyri akfør skrásett frá og við hesum degi.

Stk. 2. Fyri akfør, ið verða umskrásett, aftaná at henda lóg er komin í gildið, verður avgjald goldið soleiðis:

a) Akfør, ið eftir higartil galdandi reglum einki skrásetingargjald hava goldið, gjalda aftaná umskráseting, skrásetingargjald eftir hesi lóg. Viðv. akførum fevnd av § 10, jbr. tó § 18.

b) Akfør, sum hava goldið skrásetingargjald eftir higartil galdandi reglum, gjalda við umskráseting til landskassan, møguligan mun millum áður goldið skrásetingargjald og skrásetingargjald, roknað eftir reglum í hesi lóg.

c) Fyri akfør ið eru í endurgjaldsskipan, tá henda lóg kemur í gildið, verða fyritreytirnar fyri endurgjaldið, framvegis galdandi.

d) Fyri akfør skrásett áðrenn 1986, verður einki skrásetingargjald at gjalda við umskráseting.

nyt køretøj.

Stk. 3. I tilfælde, hvor motorkøretøjet har været registreret i udlandet i 5 år eller længere, er registreringsafgiften 50% af registreringsafgiften for tilsvarende nyt køretøj."

16) § 18, stk. 3 affattes således:
"**Stk. 3.** Registreringsafgiften kan dog aldrig være lavere end 30% af værdigrundlaget af tilsvarende køretøj som nyt."

17) § 27, stk. 4 affattes således:
"**Stk. 4.** Bøder og forfalden registreringsafgift efter denne lov, kan af Føroya Gjaldstova indhentes ved pantning."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen, og er gældende for køretøjer der registreres fra og med denne dag.

Stk. 2. For køretøjer der bliver omregistrerede efter at denne lov træder i kraft, svares afgift på følgende måder:

a) Køretøjer der efter hidtil gældende regler ikke har svaret nogen afgift, skal ved omregistrering, svare registreringsafgift i henhold til denne lov. Vedr. køretøjer omfattet af § 10, jf. § 18.

b) Køretøjer der har svaret afgift efter hidtil gældende regler, svarer ved omregistrering til landskassen, eventuell difference mellem tidligere svaret afgift og afgift, udregnet efter reglerne i denne lov.

c) For køretøjer der er i refusionsordning, da denne lov træder i kraft, bliver betingelserne for refusionen, fortsat gældende.

d) For køretøjer der er registreret for 1986, afkræves der ingen afgift, ved omregistrering.

Viðmerkingar:

Uppskot landsstýrisins er ein royndt at gera øll akfør biligari, so fólk fáa betri ráð at skifta gamla bilin út. Somuleiðis verður hugsað um størri trygd í ferðsluni, nú bilparkin í Føroyum er vorðin nógv eldri.

Í 1993 fekk landskassin eina inntøku uppá 9 mió. kr., og pr. 30.11. í ár eru bert 6 mió. kr. komnar í landskassan av sølu av umleið 100 akførum.

Uppskot landsstýrisins førir við sær, at gjøldini til landskassan verða 30-40% lægri fyri hvønn bil.

Av tí at so nógvir gamlir bilar eru í "bilparkini", fara væntandi nógv at nýta høvi at skifta gamla bilin út.

Um sølan verður 100 bilar um árið, sum hon er í løtuni, so minka inntøkur landskassans úr 6 mió. kr. í 4 mió. kr., men landsstýrið væntar, at sølan møguliga kemur upp á 200 bilar í 1995, so inntøkur landskassans verða 8 mió. kr. í 1995.

Landsstýrið væntar, at bilasølan spakuliga fer at koma app ímóti 500 bilum árliga, so hvørt sum fólk fara at skifta gamla bilin hjá sær út. Við verandi gjøldum svarar hetta til eina inntøku til landskassan uppá 30 mió. kr. Uppá longri sikt svarar ein lækking av skrásetingargjaldinum uppá 30-40% til ein inntøkumiss fyri landskassan uppá 10 mió. kr.

Í uppskotinum er vektgjaldið strikað. Virðisgjaldið verður útroknað á øðrum virðisgrundarlagi enn áður. Skrásetingargjaldið verður nú bert roknað í tveimum stigum, 40% av virðisgrundarlaginum undir 80.000 kr., og 60% av tí partinum, ið fer upp um 80.000 kr.

Skotið verður upp at virðisgrundarlagið verður:
Fakturaprísur (íroknað farmagjald, flutningstrygging, vørugjald, toll, uppskipan og klárgerð)
+ MVG
+ Vinning.

Sambært núgaldandi skipan, er virðisgrundarlagið fakturaprísurin (íroknað farmagjald, flutningstrygging, vørugjald, uppskipan og klárgerð), men ikki vinningur og tollur. Hesi ávirka eftir núgaldandi lóg ikki skrásetingargjaldið, tí tey verða ikki roknað uppí virðisgrundarlagið.

Henda broyting í virðisgrundarlagnum, skuldi fört til eina ávísa regulering av vinninginum, tí jú minni vinningurin verður, jú minni verður skrásetingargjaldið, og harvið verður akfarið lættari at selja. Lækkingin av skrásetingargjaldinum fær eina størst ávirkan í teimum førum, har seljarin ikki tekur so stóran vinning.

Hugsast kann eisini, at ein ávís umskráseting fer at vera, av tí at t.d. vøruvognar nú kunnu umskrásetast til t.d. persónbilar, eftir lagaligum treytum. Og hetta kann geva landskassanum eitt sindur av inntøku, ið annars ikki hevði verið.

1. viðgerð 2. januar 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 16. januar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram tann 22. december 1994 og aftaná fyrstu viðgerð tann 2. januar 1995 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og í hesum sambandi hava umboð fyri bilhandlarafelagið verið á fundi við nevndina.

Umboðini fyri bilhandlarafelagið førdu fram, at felagið heldur tað vera skeivt, at vinningurin hjá bilsølunum skal roknast við í virðisgrundarlagið. Tey halda, at verður uppskotið samtykt, so verða bilasølur einasta vinnugrein, ið skal gjalda annað avgjald enn mvg av vinninginum. Tey upplýstu, at bruttovinningurin hjá bilasølunum er 10-15% av útsøluprísinum. Eisini greiddu umboðini frá, at tað er so gott sum ómøguligt at selja ein bil við einum virðisgrundarlagi undir 80.000 kr, og samstundis at hava vinning av einari slíkari sølu, og at ein annar truplulleiki, ið bilasølurnar hava er, at tryggingin hevur lækkað bruttoprísin á umvælingum og eykalutum við 10 - 15%.

Uppá fyrispurning frá nevndini greiddu umboðini frá, at tað eru umleið 10 - 12 bilasølur í Føroyum í dag og at tær, ið ikki eru farnar á húsagang eru sanceraðar.

Umboðini halda, tað er betri at halda vinningin uttanfyri virðisgrundarlagið og hækka skrásetingargjaldið, ella einki at gera, enn at rokna vinningin við í virðisgrundarlagið.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Karl Robert Johansen, Finnbogi Ísakson og Marny Dahl Sørensen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins hóast hesar viðmerkingar frá FBV og mælir til at samtykkja tað.

Meirilutin heldur, at tá ið avgjaldsupphæddin til landskassan verður lækkað við 30 - 40% eigur hetta at koma til sjóndar við einum lægri útsøluprísi, og tað er endamálið við uppskotinum.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:
At nakað má gerast við skrásetingargjaldið av motorakførum v.m. er einki at ivast í. Fólkaflokkurin legði tí uppskot fyri løgtingið hesum viðvíkjandi longu 22. november 1994. Málið varð beint í skattanevndina og liggur har enn, tí landsstýrið vildi gera sítt egna uppskot. Hetta uppskot verður so lagt fyri løgtingið 22. december 1994.

Undir viðgerðini er nevndin gjørd varug við tað sera óhepna í, at skrásetingargjald nú eisini skal takast av vinningi og MVG. MVG er tað seinasta avgjaldið, ið verður lagt omaná og soleiðis er ikki bert í Føroyum. Nú er ætlanin fyri fyrstu ferð at bróta hesa meginreglu, og har ein skriðan er lopin, er onnur væntandi.

Við at leggja skrásetingargjald oman á vinning og MVG, verður lagt upp til, at landskassans peningur skal nýtast at kappast við. Av tí at MVG ikki er "meir" enn 25%, ger tað ikki so stóran mun í kappingini. Men við skrásetingargjaldinum tosa vit um eitt avgjald av vinningi upp á 100%. Skulu vit hava eitt frítt handilslív, er ikki rætt, at handlar skulu hava landskassans spening at kappast við. Hetta kemur av avskepla handilslívið og kann hava sera óhepnar avleiðingar við sær.

Sjálvandi skulu handlar kappast, men ikki við landskassans peningi.

Minnilutin skjýtur tí upp at broyta uppskot landsstýrisins soleiðis, at skrásetingargjald verður roknað av virði áðrenn vinning og MVG, og fyri at landskassin skal fáa tað sama, verður skotið upp, at skrásetingargjaldið verður 60% fyri allar persónvognar.

Við sama vinningi til forhandlara kemur ein bilur eftir landsstýrisins uppskoti at kosta kr. 194.032, og við omanfyri nevndu broyting kemur sami bilur at kosta kr. 187.760. Ein annar bilur kemur at kosta kr. 86.833 eftir uppskoti landsstýrisins og kr. 88.605 við omanfyri nevndu broyting. Við øðrum orðum mest sum tað sama, men við hesum broytingaruppskotinum koma forhandlarar at kappast undir vanligum treytum, meðan landskassin og brúkarin fáa tað sama.

Pástandurin um, at verða vinningur og MVG ikki tikin við í virðisgrundarlagið, hækkar forhandlarin bara vinningin við tí, sum skrásetingargjaldið minkar, er burturvið.

Vit hava eina lóg um vinningssteðg, har einasta økið í Føroyum, henda lóg kann kontrollerast, nevniliga er bilasøla. Fyri hvønn einasta bil, ið er seldur og kemur at verða seldur í Føroyum, fær toll- og skattstovan eina uppgerð, ið vísir øll tøl í samband við bilin og harvið eisini fakturaprís, vinning og MVG.

Toll- og skattstovan kann tí lættliga kontrollera og syrgja fyri, at lógin um vinningssteðg verður hildin.

Hin vegin er kappingin so mikið stór millum bilhandlarar, at hetta neyvan er nakar trupulleiki. Men fyri tey, ið eru bangin fyri hesum, er lógin um vinningssteðg eina eyka trygd, sum kann handhevast.

Minnilutin mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við niðanfyri standandi

broytingaruppskoti

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1, nr. 2 og 3, í uppskoti landsstýrisins verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, 1. stk. verður orðað soleiðis:
"Tað avgjaldsskylduga virðið á einum nýggjum akfari við allari vanligari útgerð og eykaútgerð er fakturaprísur (íroknað farmagjald, flutningstrygging, vørugjald, tollur, uppskipan og klárgerð)."

2) § 3 verður orðað soleiðis:
"Persónsvognar,
Virðisgjald: 60%, tó ongantíð minni enn kr. 10.000."

I § 1, nr. 2 og 3, i landsstyrets forslag foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 1 affattes således:
"Den afgiftspligtige værdi for et nyt køretøj, iberegnet standardudstyr og ekstraudstyr, er fakturaprisen (iberegnet fragt, transportforsikring, vareafgift, told, losning og klargørelse)".

2) § 3 affattes således:
"Personvogne.
Værdiafgift: 60%, dog aldrig mindre end kr. 10.000."

2. viðgerð 19. januar. Samtykt 51-0 atkvøðum. Broytingaruppskot minnilutans fall við 10-0 atkvøðum.

Millum 2. og 3. viðgerð løgdu løgtingsmenninir Tórður J. Niclasen, Jenis av Rana, Lasse Klein og Jákup Olsen fram soljóðandi.

Broytingaruppskot

til 3. viðgerð

Undir pkt. 15 í uppskoti landsstýrisins verður skoytt uppí sum stk. 4 í løgtingslóg nr. 175 frá 18. december 1992, § 15:
"Fyri motorakfør, ið hava verið endaliga skrásett í útlondum minni enn 5 ár og verða innflutt til umvælingar, er skrásetingargjaldið 70% av fakturaprísinum."

Under pkt. 15 i landsstyrets forslag tilføjess som stk. 4 i lagtingslov nr. 175 af 18. december 1992, § 15:
"For motorkøretøjer, som har været registreret i udlandet i mindre end 5 år og indføres til reparation, er registreringsafgiften 70% af fakturaprisen."

Viðmerkingar:

Í samband við ætlaðu broytingarnar í "skrásetingarlógini" sendu "Bilverkstaðseigarar" 27. december 1994 avrit av skrivi sent landsstýrinum 12. november 1994.

Í skrivinum, sum fór í skattanevndina, varð m.a. mælt til, at

1) Tolllógin verður broytt soleiðis, at akfør við skaða, sum verða innflutt til umvælingar og viðarsølu, verða tollað eftir keypsprísinum.
Hesin skal vera skjalprógvaður við faktura, sum váttar við undirskrift seljarans, at upphæddin er rætt, og annars lýkur tey krøv, lógin setir.

2) Akfarið, ið innflutt verður, skal ikki vera eldri enn 5 ár.

3) Fyri at kunna innflyta bilar á henda hátt, skal viðkomandi vera góðkendur av Bileftirlitinum (t.v.s. skal hava neyðuga útbúgving sum bilmekanikari, eins og virkið hevur tey tól, neyðug eru til hetta endamál).

4) Áðrenn akfarið verður skrásett, verður tað gjøllla kannað av Bileftirlitinum, sum skal meta um tryggleikan, og at akfarið annars lýkur lógarásett krøv.

5) Loyvi til at innflyta og gera aftur bilar kann verða inndrigið, um Bileftirlitið leggur til merkis, at arbeiðið er illa úr hondum greitt, og grovt óskotni er framt.

Loksins í áheitanini verður sagt:

"Umframt at varðveita og skapa nýggj arbeiðspláss verður við slíkari skipan spardur valuta, og møguleikin skaptur hjá fólki, sum í dag ikki hava ráð at keypa nýggjan bil, at ogna sær ein góðan, brúktan bil í staðin - fyri sámuligan prís.

Havandi í huga, at myndugleikin hevur sett ávís tiltøk í verk til tess at betra um korini hjá ymiskum ídnaðarvirksemi, halda undirritaðu ikki tað verða órímiligt, at slík skipan sum omanfyri nevnd verður sett í verk og harvið kemur at stimbra hendan partin av tí føroyska ídnaðinum."

Samsvarandi hesi áheitan verður broytingaruppskot sett fram.

Við 3. viðgerð 24. januar 1995 full uppskotið við 9-0 atkvøðum.

Millum 2. og 3. viðgerð og legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

til 3. viðgerð

Í broytingaruppskotinum frá skattanevndini verður pkt. 1 orðað soleiðis:

1) § 2, 1. stk. verður orðað soleiðis:
"Tað avgjaldsskylduga virðið á einum nýggjum akfari við allari vanligari útgerð og eykaútgerð, tó undantikið ABS-bremsur og luftpútur, er fakturaprísur (íroknað farmagjald, flutningstrygging, vørugjald, tollur, uppskipan og klárgerð)."

I ændringsforslaget fra skatteudvalget affattes pkt. 1 således:

1) § 2, stk. 1 affattes således:
"Den afgiftspligtige værdi for et nyt køretøj, iberegnet standardudstyr og ekstraudstyr, dog ABS-bremser og luftpuder undtaget, er fakturaprisen (iberegnet fragt, transportforsikring, vareafgift, told, losning og klargørelse)."

Óli Breckmann, løgtingsmaður tók seinni uppskotið aftur og legði saman við løgtingsmonnunum Tordi J. Niclasen, John Petersen og Jákupi Olsen fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð

í broytingaruppskotinum frá skattanevndini verður pkt. 1 orðað soleiðis:

"1) § 2, 1. stk. verður orðað soleiðis:
"**§ 2.** Tað avgjaldsskylduga virðið á einum nýggjum akfari við allari vanligari útgerð og eykaútgerð er søluprísurin íroknað MVG, men ikki íroknað avgjald eftir hesari lóg, við sølu her í landinum, tá ið skráseting fer fram. Serstøk trygdarútgerð, sum er luftpútur ("airbags"), ABS-bremsur, trygdarselar við hurðarnar aftan, høgrasíðuspegil at stilla innan, bakrútsviskari, er ikki partur av avgjaldsskyldnga virðinum.""

I ændringsforslaget fra skatteudvalget affattes pkt. 1 således:

"1) § 2, stk. 1. affattes således:
"**§ 2.** Den afgiftspligtige værdi for et nyt køretøj er salgspris, indbefattet Merværdiafgift, men uden afgift efter denne lov, ved salg til bruger her i landet på registreringstidspunktet. Særligt sikkerhedsudstyr, som er airbag, ABS-bremser, rulleseler på bagsædets yderpladser, indv. justerbart højre sidespejl, bagrudevisker, indgår ikke som del af værdigrundlaget.""

3. viðgerð 24. januar 1995. Broytingaruppskotið samtykt við 22-0 atkvøðum. Málið endaliga samtykt við 25-1 atkvøðum.

Lóg nr. 14 frá 1. februar 1995.

64 Eykafíggjarløgtingslóg 1994

Ár 1994, hósdagin 22. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Sí skjal ...

Viðmerkingar:

Tann stóra búskaparliga afturgongdin hevur gjørt tað sera torført at meta um bæði inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini seinastu árini. Hóast stóru broytingarnar í búskapinum væntar landsstýrið, at hallið verður nakað minni, enn roknað varð við við ársbyrjan.

Tá fíggjarlógin fyri 1994 varð samtykt, varð roknað við, at hallið fór at verða 261,3 mió. kr.

Á eykafíggjarlógini er roknað við, at hallið áðrenn serligar útreiðslur verður 194,5 mió. kr.

Viðmerkjast skal, at hesi tøl ikki eru sambærilig.

Á fíggjarlógini vórðu 40 mió. kr. settar av undir einum til serligar útreiðslur til ymsar almennar grunnar, og stóð henda útreiðsla upprunaliga undir grein 21: Effektivar veðhaldsbindingar fyri almennar grunnar.

Á eykafíggjarlógini er henda upphæddin sundurgreinað út á almennu grunnarnar, og sett undir serligar útreiðslur.

Skal fíggjarlógin 1994 samanberast við eykafíggjarlógina, er sostatt neyðugt at samanbera tvey høvuðsúrslit. Annað er úrslitið áðrenn eginpeningsveitingar, og hitt er úrslitið har eginpeningsveitingarnar eru tiknar við.

	FL 1994 mió. kr.	EykaFL 1994 mió. kr.
Úrslit aftaná rakstur og fløgur:	-221,3	-194,5
Úrslit aftaná eginpeningsveitingar:	-261,3	-244,5

Úrslitið er sostatt munandi betur enn roknað varð við, uttan mun til um hugt verður eftir úrslitinum áðrenn ella aftaná eginpeningsveitingarnar.

Ein roknskaparmeginregla (roknskaparprinsipp) er broytt á eykafíggjarlógini fyri 1994.

Á eykafíggjarlógini 1994 er lagt um frá at nýta goldnar rentur og kurstap til tíðargreindar (periodiseraðar) rentur og kurstap.

Harvið kemur roknskapurin at innihalda bæði tær rentur, ið skulu roknast uppá 1994, men ikki gjaldast fyrr enn í 1995, og somuleiðis eisini tær rentur, ið eru goldnar í 1994, men sum skuldu verið roknaðar uppá 1993. Sostatt eru rentur og kurstap fyri meira enn eitt ár bókaðar uppá 1994.

Fyri at fáa eina beinari eykafíggjarlóg og roknskap, eru tær rentur og kurstap, ið viðvíkja 1993 og árunum frammanundan, flutt undir serligar útreiðslur.

Úrslitið áðrenn hesar broytingar í roknskaparmeginreglunum er sum nevnt 244,5 mió. kr. Verða rentur og kurstap frá áðrenn 1. januar 1994 løgt afturat, er samlaða hallið 445,1 mió. kr.

Samanumtikið kann sigast, at inntøkurnar verða á sama støði, sum landsstýrið upprunaliga roknaði við, meðan útreiðslurnar eru munandi lægri.

	mió. kr. FL 1994	mió. kr. EykaFL 1994
Inntøkur	2.587	2.581
Rakstrarútreiðslur	2.684	2.641
Úrslit av rakstri	-97	-60
Íløgur	124	135
Úrslit áðr. eginpen.veit.	-221	-195
Eginpeningsveitingar	40	50
Úrslit aftaná eginpen.veit.	-261	-245

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum saman við búskapardeildini tekur nú stig til, at deildirnar í Tinganesi skulu syrgja fyri, at nýtsla á einum rakstrarstað skal verða játtað antin yvir fíggjarlógina ella við eykajáttan, áðrenn hon verður útgoldin. Somuleiðis skulu avvarandi stovnsleiðarar søkja um eykajáttan í árinum, um teir meta, at lógarbundnar útreiðslur eru undirmettar á fíggjarlógini.

Viðmerkingar til einstøk rakstrarstøð:

Rakstrarstað 10018 Løgtingsmenn:
Játtanin til 10018 løgtingsmenn er í 1994 kr. 8.913.000, men roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður umleið kr. 9.500.000. Meirnýtslan uppá kr. 587.000 stendst í høvuðsheitum av, at val hevur verið í árinum.

Rakstrarstað 10023 Nýggj tingskipan:
Fyri at tað skal bera til hjá nevndini, ið er sett at endurskoða tingskipanina, at taka sær serkøna hjálp, eru veittar upp til kr. 150.000 sum eykajáttan til formansskap løgtingsins, at bóka á serliga konto: Nýggj tingskipan.

Rakstrarstað 10106 Løgtingsbygningur:
Játtanin til 10106 løgtingsbygningur er í 1994 kr. 560.000. Roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 660.000. Meirnýtslan uppá kr. 100.000 stendst mest av inntættan av flokshølum.

Rakstrarstað 10158 Løgtingsskrivstovan:
Játtanin til løgtingsskrivstovuna er kr. 2.343.000 í 1994.
Ein arbeiðsbólkur millum landsstýrið og løgtingsskrivstovuna hevur viðgjørt EDV-tørvin millum landsumsitingina og løgtingið og er niðurstøðan broytt tøkniskipan, ið kann gerast uttan meirkostnað eftir verandi játtan til løgtingsskrivstovuna.

Eitt fólk er sett afturat á løgtingsskrivstovuni uttan meirkostnað fyri landskassan.

Hetta varð gjørt á tann hátt, at løgtingsskrivstovan í árinum hevur fingið eina eykajáttan uppá kr. 250.000, meðan rakstrarstað 10208 løgtingstíðindi varð minkað við kr. 250.000.

Samlaða játtanin til løgtingsskrivstovuna er sostatt kr. 2.593.000.

Rakstrarstað 10208 løgtingstíðindi:
Hygg undir viðmerkingar undir rakstrarstað 10158 løgtingsskrivstovan.

Rakstrarstað 11015 Løgmaður og landsstýri:
Játtanin á 11015 Løgmaður og landsstýri er í 1994 kr. 3.047.000. Neyðugt verður at seta kr. 775.000 á eykafíggjarlógina fyri 1994, soleiðis at samlaða játtanin verður kr. 3.822.000. Orsøkin til hetta er, at vit fingu nýtt landsstýrið í 1994, og verða lønarútreiðslurnar tí munandi størri við tað, at fráfarandi landsstýrismenn fáa løn í 6 mánaðir aftaná, at teir fara frá.

Rakstrarstað 11359 Almannastovan:
Játtanin til almannastovuna var í 1994 kr. 17.000.000.
Almannastovan hevur fingið eina eykajáttan í árinum uppá kr. 900.000 til starvsfólk, men roknað verður við, at samlaða nýtslan í 1994 verður tilsamans kr. 17.700.000.

Rakstrarstað 11898 Útskifting og matrikulstova:
Játtanin til 11898 útskifting og matrikulstova er í 1994 kr. 4.500.000. Nýtslan í 1994 verður væntandi kr. 6.240.000. Sostatt er talan um eina meirnýtslu í 1994 uppá kr. 1.740.000.

Rakstrarstað 11991/253704 Útreiðslur av vali:
Játtanin til 11991/253704 útreiðslur av vali er í 1994 kr. 800.000. Í uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1994 mælti umsitingin til at seta kr. 900.000 til útreiðslur av vali í 1994, men játtanin í 1994 varð kr. 800.000. Nú sær út til, at nýtslan á hesi konto í 1994 verður nærri kr. 1.000.000. Tað er ein meirnýtsla uppá kr. 200.000.

Tað var bæði løgtings- og fólkatingsval í 1994. Størstu útreiðslurnar av løgtingsvalinum eru samsýningarnar til valstýrislimirnar og til at kunngera valevnislistarnar. Útreiðslurnar gerast størri, jú fleiri flokkar eru. Samsýningarnar eru tær somu, sum til valið 1990.

Rakstrarstað 11991/373305 Landsstýrinum at ráða yvir:
Játtanin til 11991/37305 landsstýrinum at ráða yvir var í 1994 kr. 1.300.000. Nýtslan í 1994 verður tó metu at verða kr. 2.100.000. Samlaða meirnýtslan í 1994 verður kr. 800.000. Av hesum er eykajáttan fingin í árinum uppá kr. 500.000 til Gørtsfrágreiðingina. Meirnýtslan stavar frá, at kontoin er ov neyvt budgetterað. Serliga er tað stýrisskipanarálitið, samráðingar við bretar og Rolf Guttesen-nevndin, sum hava kostað meira enn væntað í 1994.

Rakstrarstað 12026 Útreiðslur viðvíkjandi ríkissjúkrahúsinum:
Játtanin til 12026 útreiðslur viðvíkjandi ríkissjúkrahúsinum er í 1994 kr. 26.000.000. Roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 32.000.000. Tað er ein meirnýtsla í 1994 uppá kr. 6.000.000. Gjaldið til Ríkissjúkrahúsið var í 1993 kr. 32.200.000.

Rakstrarstað 12508 Læknar:
Játtanin til 12508 læknar er í 1994 kr. 2.500.000, men roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 2.700.000. Tað er ein meirnýtsla í 1994 uppá kr. 200.000. Meirnýtslan stendst av størri tali av avloysarum, ferðaútreiðslum v.m.

Rakstrarstað 12907/303077 Vaksinatiónir:
Játtanin til 12907/303077 vaksinatiónir er í 1994 kr. 500.000. Hóast eykajáttan er fingin í árinum uppá kr. 1.167.000 til Hib-vaksinatiónir verður ikki roknað við, at nýtslan í 1994 verður meira enn kr. 1.200.000.

Rakstrarstað 12907/303243 Upplýsing/viðgerð av rúsdrekkamisnýtarum:
Játtanin til 12907/303243 upplýsing/viðgerð av rúsdrekkamisnýtarum er í 1994 kr. 9.500.000. Roknað verður tó við, at nýtslan í 1994 verður kr. 9.000.000. Tað er ein minninýtsla uppá kr. 500.000.

Minninýtslan til upplýsandi virksemi og rúsdrekkaráðgeva kemst m. a. av tí, at játtanarviðurskiftini fyrst komu upp á pláss so seint á árinum.

Rakstrarstað 12907/373305 Landsstýrinum at ráða yvir:
Játtanin til 12907/373305 landsstýrinum at ráða yvir er í 1994 kr. 50.000. Nýtslan í 1994 verður væntandi kr. 630.000. Tað er ein meirnýtsla uppá kr. 580.000. Meirnýtslan svarar til útleggini í tveimum rættarmálum, har landsstýrið er dømt at gjalda. Tryggingarsambandið er kravt at afturgjalda upphæddirnar.

Rakstrarstað 13265 Strandferðsla landsins:
Játtanin til 13265 Strandferðslu landsins er í 1994 kr. 37.000.000. Roknast má við, at nýtslan í 1994 verður kr. 48.300.000. Meirnýtslan verður sostatt kr. 11.300.000 í 1994. Hetta tal kemur soleiðis fram:

Meirnýtsla	kr. 4.000.000
Uppathald av tyrlurakstri	kr. 1.100.000
IMO krøv	kr. 6.200.000
Tilsamans	kr. 11.300.000

IMO krøvini (trygdarkrøv til skipini) kostaðu ferjureiðaríunum nógvan pening, og Strandferðslan var eingi undantak.

Á fundi 26. september 1993 millum landsstýrið og Strandferðsluna tók landsstýrið undir við, at arbeiðini skulu gerast, og at allar lógir og krøv av tílíkum slagi skulu haldast. Á fundinum fekk Strandferðslan tilsøgn um, at kostnaðurin skuldi verða goldin uttanum ársjáttanina.

Viðvíkjandi uppathaldi av tyrlurakstri er at siga, at í sambandi við at landsstýrið flutti raksturin til Atlantic Airways tann 1.4.1994, varð lyfti givið um, at landsstýrið skuldi rinda eykakostnaðin av steðginum. Eykakostnaðurin er ikki endaliga gjørdur upp enn, men roknað verður við, at upphæddin verður umleið kr. 1.100.000.

Harafturat kemur, at Strandferðslan í 1992 og 1993 hevur havt eitt undirskot, sum við árslok 1993 var kr. 9.822.280. Samlaða uppskotið til játtan á eykafíggjarlógini 1994 er sostatt kr. 21.122.280.

Rakstrarstað 13094, 13056, 13018, 13061, 13023, 13037, 13042 Landsverkfrøðingurin:
Samlaða játtanin til landsverkfrøðingsstovnin hevur hildið í 1994. Tó hevur landsverkfrøðingurin søkt um, at kr. 500.000 verða fluttar av 13042 flogferðsla til 13018 nýggir vegir og brýr v.m.

§ 13 Útvarps- og sjónvarpssendinet (viðlíkahald):
Telefonverkið hevur mett, at neyðugar ábøtur á sjónvarpsnetið, úskiftan av bardunum og antennum v. m. skulu gerast fyri umleið kr. 858.000 í hesum umfarinum. Arbeiði byrjaði í 1993, men steðgur kom í vegna væntandi peningajáttan. Tað, sum higartil er gjørt, kostar kr. 342.000 og søkt verður um at fáa peningin á eykafíggjarlógina fyri 1994. Írestandi kr. 500.000 eru settar av á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1995.

Rakstrarstað 14117 Eftirlønir:
Játtanin til 14117 eftirlønir er í 1994 kr. 11.000.000. Tó verður mett, at nýtslan í 1994 verður kr. 11.400.000 í 1994. Meirnýtslan í 1994 verður sostatt kr. 400.000. Hetta eru lógarbundnar útreiðslur, sum mettar eru ov lágt frammanundan.

Rakstrarstað 14307 Tøkniútbúgving, Norðoyardepilin.
Játtanin til tekniska skúla í Klaksvík var í 1994 kr. 8.000.000. Roknað verður við at nýtslan í 1994 verður umleið kr. 8.795.553. Meirnýtslan er sostati kr. 795.553 í 1994. Eykajáttan er fingin í árinum til meirnýtsluna í tveimum umførum uppá ávikavist kr. 500.000 og kr. 295.553.

Rakstrarstað 14331 Klaksvíkar HF-skeið:
Játtanin til 14331 Klaksvíkar HF-skeið er í 1994 kr. 2.000.000. Mett verður, at nýtslan í 1994 verður kr. 2.280.000.

Meirnýtslan í 1994 verður sostatt kr. 280.000. Orsøkin er, at ikki var møguleki fyri samlestri millum Tekniska skúla og HF, sum væntað í fíggjarætlanini.

Rakstrarstað 14378 Føroya Studentaskúli og HF-skeið:
Játtanin til 14378 Føroya Studentaskúla og HF- skeið er í 1994 kr. 20.260.000, men roknað verður við at nýtslan í 1994 verður kr. 21.260.000. Av meirnýtsluni í 1994 uppá kr. 1.000.000 er eykajáttan fingin í árinum uppá kr. 276.250.

Meirnýtslan stendst m.a. av, at undirskot hevur verið á kantinurakstrinum.

Rakstrarstað 14409 Føroya Handilsskúli:
Játtanin til handilsskúlan var í 1994 kr. 14.900.000. Nýtslan í 1994 verður tó væntandi

kr. 15.113.000. Handilsskúlin hevur í árinum fingið eina eykajáttan uppá kr. 213.000 til fígging av næmingaupptøku á handilsskúlanum. Samstundis varð játtanin til 14991/313662 Skúlabókagrunnur/innrætting-/fløgukonto minkað við kr. 213.000.

Rakstrarstað 14485 Dieselmotor simulator:
Játtanin til 14485 dieselmotor simulator er í 1994 kr. 500.000, men roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 625.000. Meirnýtslan uppá kr. 125.000 kemst av, at í sambandi við dagføring av simulator útgerðini, varð útgerðin tollað, og hetta var ikki roknað við, tá ið fíggjarætlanin varð Iøgd.

Rakstrarstað 14777 Prøvtøkur:
Játtanin til 14777 prøvtøkur er í 1994 kr. 2.844.000. Roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður verður kr. 3.044.000. Meirnýtslan uppá kr. 200.000 kemst av, at nógv meiri virksemi hevur verið á hesum øki.

Rakstrarstað 14846 Skúlabókaútgava:
Játtanin til skúlabókaútgávu var í 1994 kr. 3.669.000. Í árinum er eykajáttan givin uppá kr. 187.000. Peningurin skuldi nýtast til ókeypis skúlabøkur til kommunurnar. Samstundis var játtanin til fløgur/innrætting - skulabókagrunnurin minkað við kr. 187.000.

Roknað verður við, at nýtslan til skúlabókaútgávu í 1994 verður kr. 3.856.000.

Rakstrarstað 14967/313646 Næmingaheim, rakstrarstudningur:
Játtanin til 14967/313646 næmingaheim, rakstrarstudningur er í 1994 kr. 389.000; men tá søkt verður um kr. 262.000 afturat yvir cykafíggjarlógina í 1994 er tað tí, at tey tvey næmingaheimini ikki hava fingið úgoldnan tann lógbundna studningin í 1991 og 1992, sum er uppá kr. 262.000.

Rakstrarstað 14991/313662 Fløgur. Skúlabókagrunnur, innrættan:
Kontoin er minkað við kr. 213.000 í árinum. Hygg annars undir viðmerkingar til rakstrarstað 14409 Føroya Handilsskúli.
Harafturat er kontoin minkað við kr. 187.000. Hygg annars eisini undir viðmerkingar til rakstrarstað 14846 Skúlabókaútgáva. Sostatt verður eingin peningur nýttur í 1994 til innrætting hjá Føroya Skúlabókagrunni.

Rakstrarstað 14986/313343 Studentaskúlin á Kambsdali:
Fíggjarnevndin hevur við skrivi dagfest 6. juli 1994 játtað landsstýrinum at nýta kr. 300.000 í 1994 til liðuggerð av byggingini á Kambsdali og at ein minninýtsla í 1993 verður uppá somu upphædd. Av tí at endalig avrokning ikki kundi gerast fyri fleiri

arbeiðir fyrr enn seinni á árinum í 1994, verður nýtslan í 1994 kr. 610.000, og sostatt er minninýtslan fyri 1993 sama upphædd.

Rakstrarstað 14986/313733 Maskinskúlin:
Við heimild í løgtingslóg nr. 58 frá 10. mei 1994 hevur landsstýrið keypt ognina matr. nr. 1340 e og partar av matr. nr. 1339 d, Tórshavn til Føroya maskinskúla.

Keyp og umbygging verður mett at kosta kr. 8.260.000 + meirvirðisgjald kr. 940.000. Av hesum verða brúktar kr. 5.000.000 í 1994 til keyp, projektering og útbjóðing.

Rakstrarstað 15983 Føroya Fornminnisavn:
Við heimild í løgtingslóg nr. 59 frá 10. mei 1994 hevur landsstýrið keypt ognina matr. nr. 1 ææ, Hoyvík til fornminnisavn. Keyp og umbygging verður mett at kosta falt kr. 4.100.000 + kr. 520.000 í meirvirðisgjaldi. Av hesum verða brúktar kr. 3.280.000 í 1994 til keyp og umbygging.

Rakstrarstað 16301 Vaktar- og bjargingartænastan:
Játtanin til vaktar- og bjargingartænastuna er í 1994 kr. 16.100.000. Henda játtanin fer at halda í 1994. Men stovnurin hevði byrjunartrupuleikar við, hvussu meirvirðisgjaldið í samband við keyp av útgerð skuldi ávísast, soleiðis at tað endaði við eitum halli í 1993 uppá kr. 413.643. Vaktar- og bjargingartænastan hevur skotið upp at játta peningin á cykafíggjarlógini 1994, og hevur fiskivinnudeildin viðmælt hesum.

Rakstrarstað 16417 Íløgustuðul:
Játtanin til 16417 íløgustuðul í 1994 er kr. 45.000.000.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1994 er eftir øllum at døma bygd á útgjaldingarnar fyri 1993, tá lógin bert var galdandi í slakar 10 mánaðir frá 7. mars 1993.

Nýggjastu ábendingarnar fyri 1994 vísa, at kostnaðurin fer at verða umleið kr. 63.000.000.

Sostatt er talan um eina meirnýtsla uppá kr. 18.000.000 í 1994.

Rakstrarstað 16505 Fiskaaling (rakstur):
Landsstýri og fíggjarnevnd hava samtykt at veita rakstrarstaði 16505 P/F Fiskaaling (rakstur) eina cykajáttan í 1994 uppá kr. 1.380.000.

Rakstrarstað 16607 Fiskivinnuráð:
Játtanin til 16607 fiskivinnuráð er í 1994 kr. 250.000. Roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 330.000. Tað er ein meirnýtsla uppá kr. 80.000.

Meirnýtslan stendst av, at skrivarin hjá fiskivinnuráðnum, sum við tíðini hevur røkt fleiri og fleiri uppgávur hjá landsskrivstovuni, eisini í 1994 er løntur av hesum rakstrarstað. Men frá 1995 verður hann løntur av landsskrivstovuni fyri hetta arbeiði.

Rakstrarstað 16904/333407 Tiltøk fyri alivinnuna:
Játtanin til fløgustuðul til alivinnuna var í 1994 kr. 15.000.000.

Kostnaðurin av verandi lóg var kr. 25.000.000. Tí varð lagt uppskot fyri tingið um at broyta lógina, so hon samsvaraði játtanini. Løgtingið tók ikki undir við uppskotinum. Men landsstýrið og fíggjarnevndin hava veitt eina eykajáttan í 1994 uppá kr. 10.000.000 til fløgustuðul til alivinna.

Samlaða játtanin til fløgustuðul til alivinnuna er sostatt kr. 25.000.000 í 1994, og roknað verður við, at peningurin verður brúktur.

Rakstrarstað 18109 Arbeiðseftirlitið:
Játtanin til 18109 arbeiðseftirlitið er í 1994 kr. 2.600.000.
Roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 2.700.000. Tað er ein meirnýtsla uppá kr. 100.000, hetta svarar til leiguútreiðslurnar til fyrrverandi deildina í Saltangará.

Rakstrarstað 18323 Studningur til kolagrevstur:
Játtanin til 18323 studning til kolagrevstur er í 1994 kr. 300.000. Mett verður, at nýtslan í 1994 verður kr. 330.000. Tað er kr. 30.000 meir enn játtanin í 1994.

Rakstrarstað 18532 Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál:
Játtanin til ídnaðarfremjandi endamál er í 1994 kr. 1.500.000.
Landsstýrið skjýtur upp at játta kr. 2.000.000 í grunnin til ídnaðarfremjandi endamál yvir eykafíggjarlógina 1994.

Rakstrarstað 18496 Skipsbyggiendurgjald:
Játtanin til 18496 skipsbyggiendurgjald er í 1994 kr. 5.000.000.
Men ikki verður roknað við, at nýtslan í 1994 verður meira enn kr. 3.000.000. Tað er sostatt ein minninýtsla uppá kr. 2.000.000 í 1994.

Rakstrarstað 18584 Javning móti tollverju:
Játtanin til 18584 javning móti tollverju er í 1994 kr. 20.000.000. Men roknað verður við, at nýttar verða umleið
kr. 9.400.000 í 1994.

Landsstýrið skjýtur upp, at peningurin kr. 11.600.000, sum ikki verður brúktur í 1994

á hesum rakstrarstað, sum í uppskoti til fíggjarløgtingslóg í 1995 verður kallað menning av fiskivinnu á landi, verður settur í grunn.

Menningarstovan hevur í skrivi til landsstýrið mælt til at stuðulin til menning av fiskivinnu á landi kemur undir aðra skipan - t.d. við eksternum grunni. Við hesum slepst eisini undan periodiseringstrupuleikum.

Hesum tekur Deildin fyri fiski- og aðrari vinnu undir við og mælir tí til, at eftirverandi játtan fyri 1994 verður sett í grunn.

§ 18 Íløgur. Keyp av partabrøvum í P/F Elektron:
Landsstýrið hevur søkt um eykajáttan uppá kr. 1.947.000 til víðkan av partapeninginum í P/F Elektron, so sleppast kann undan, at P/F Elektron verður dóttirfelag hjá Føroya Banka. Miðað verður ímóti einum javnari býti av partapeninginum millum teir tríggjar stóru brúkarnar, Føroya Banka, Føroya Sparikassa og Føroya Landsstýri.

Rakstrarstað 18551 Framtaksgrunnurin:
Í felagslýsingin millum donsku stjórnina og landsstýrið frá 17. november 1994 er avgjørt at stovna ein framtaksgrunn við einum innskoti uppá kr. 100.000.000 frá danska statinum og kr. 100.000.000 frá føroyskari síðu.

Av innskotinum skulu 2 x 99 milliónir krónur vera lán og 2 x 1 millión krónur innskot sum stovnsfæ.

Landsstýrið hevur hugsað sær, at lánið uppá kr. 99.000.000 verður útvega úr Íleggingargrunninum fyri Føroyar, meðan innskotið uppá kr. 1.000.000 verður útvegað úr landskassanum sum játtan á eykafíggjarlógini fyri 1994.

Rakstrarstað 19042 Serforsorg bústovnar:
Játtanin til 19042 serforsorg bústovnar er kr. 33.800.000 í 1994. Roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 34.100.000. Eykajáttan er fingin til vega í árinum fyri meirnýtsluni uppá kr. 300.000. Kr. 300.000 eru tiknar av rakstrarstað 19631 dagstovnar.

Rakstrarstað 19075 Røktarheim:
Játtanin til 19075 røktarheim er í 1994 kr. 69.500.000.
Roknað verður tó við, at nýtslan í 1994 verður 66.800.000. Tað er ein minninýtsla uppá kr. 2.700.000.

Røktarheimið á Sandi verður ikki tikið í brúk í 1994.

Rakstrarstað 19106 Avlamispensión:
Játtanin til 19106 avlamispensión er í 1994 kr. 110.400.000. Nýtslan í 1994 verður væntandi kr. 114.600.000. Tað er ein meirnýtsla uppá kr. 4.200.000.

Hetta er ein lógarbundin útreiðsla. Fleiri avlamispensiónistar eru, og størri upphæddir eru útgoldnar.

Rakstrarstað 19301 Einkjupensión:
Játtanin til 19301 einkjupensión er í 1994 kr. 970.000. Roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 2.000.000.

Hetta er lógarbundin útreiðsla, og harafturat eru útreiðslur á rakstrarstað 19519 uppískoytisveiting bókað undir 19301 einkjupensión.

Rakstrarstað 19403 Vanlig forsorg:
Játtanin til 19403 vanlig forsorg er í 1994 kr. 98.000.000, men roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður ikki meir enn kr. 70.000.000. Tað er kr. 28.000.000 minni enn játtað.

Hetta er lógarbundin útreiðsla. Nógv færri enn væntað hava fingið forsorgarveiting vegna arbeiðsloysi.

Rakstrarstað 19436 Umsiting av hjálpitólum:
Játtanin til 19436 umsiting av hjálpitólum er í 1994 kr. 1.700.000, men roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 1.900.000. Tað er ein meirnýtsla uppá kr. 200.000. Meirnýtslan er til leiguútreiðslur vegna enn óbroyttan leigusáttmála.

Rakstrarstað 19441 Forsorgarstovnar:
Játtanin til forsorgarstovnar var í 1994 kr. 8.643.000.
Roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður 9.343.000.
Eykajáttan er veitt í árinum uppá kr. 700.000 til meirnýtsluna.
Peningurin kr. 700.000 er tikin av rakstrarstað 19631 dagstovnar.

Rakstrarstað 19607 Heimarøktarskipan:
Játtanin til 19607 heimarøktarskipan er í 1994 kr. 60.070, men roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 58.570.000. Tað er kr. 1.500.000 minni enn játtað.

Minninýtslan stendst av, at sambýlið í Skopun og Skálavík ikki er sett í rakstur í 1994, og kr. 500.000 er í meirinntøku frá pensjónistum við krígspensjón.

Rakstrarstað 19631 Dagstovnar:
Játtanin til dagstovnar var í 1994 uppá kr. 48.016.000. Í árinum er játtanin minkað við kr. 1.000.000., kr. 700.000 til forsorgarstovnar og kr. 300.000 til serforsorg bústovnar.

(Hygg annars undir viðmerkingar til rakstrarstøðini 19042 serforsorg bústovnar og 19441 forsorgarstovnar.) Játtanin til dagstovnar er sostatt kr. 47.016.000 í 1994. Roknað verður við, at nýtslan til dagstovnar í 1994 verður kr. 44.000.000. Talan er sostatt um eina minninýtslu í 1994 uppá tilsamans kr. 3.016.000, sum stendst av minni húsaútreiðslu í 1994.

Rakstrarstað 19659 Dagpeningaskipanin:
Játtanin til 19659 dagpeningaskipanina er í 1994 kr. 36.500.000. Roknað verður tó við, at nýtslan í 1994 verður kr. 31.000.000. Tað er ein minninýtsla uppá kr. 5.500.000.

Hetta er lógarbundin útreiðsla. Tað hava verið færri dagpeningamóttakarar við lægri útrokningargrundarlagi.

Rakstrarstað 19697 Samsýning at ansa eldri og óhjálpnum heima:
Játtanin til 19697 samsýning at ansa eldri og óhjálpnum heima er í 1994 kr. 5.400.000. Men roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 4.700.000. Tað er ein minninýtsla uppá kr. 700.000.
Hetta er lógarbundin útreiðsla.

Rakstrarstað 19868 Føroyingar á stovni í Danmark:
Játtanin til 19868 føroyingar á stovni í Danmark er í 1994 kr. 20.300.000. Men roknað verður við, at nýtslan í 1994 verður kr. 19.800.000. Tað er ein minninýtsla í 1994 uppá kr. 500.000.

Rakstrarstað 19892 Vanlukkutryggingarráðið:
Játtanin til 19892 vanlukkutryggingarráðið er í 1994 kr. 100.000. Roknað verður tó við, at nýtslan í 1994 verður kr. 600.000. Tað er ein meirnýtsla uppá kr. 500.000 í 1994.

Meirnýtslan stendst av, at lógarbroytingar viðvíkjandi avlamispensjónum og lógskyldugari vanlukkutrygging ikki eru framdar í 1994.

Rakstrarstað 19873 Inntøkutrygd hjá fiskimonnum:
Játtanin til 19873 inntøkutrygd hjá fiskimonnum er í 1994 kr. 87.000.000. Roknað verður við, at nýtslan á hesum rakstrarstað í 1994 verður kr. 99.000.000. Tað er ein meirnýtsla uppá kr. 12.000.000 í 1994.

Rakstrarstað 19994/363532 Dagheimið á Berjabrekku. Nýbygging.
Í árinum er eykajáttan uppá kr. 200.000 veitt til liðuggerð av dagheiminum á Berjabrekku og ein minninýtsla verður í 1993 uppá somu upphædd.

Lágargarður og Eysturoyar Røktarheim:
Peningurin kr. 263.000 á eykafíggjarlógini 1994 er frestandi landskassastuðul í samband við bygging av heimunum, sum vóru liðug í ávikavist 1991 og 1992.

Rakstrarstað 19956 Húsalánsgrunnurin:
Játtanin til 19956 Húsalánsgrunnin á fíggjarlógini 1994 var kr. 10.000.000.
Landsstýrið og fíggjarnevndin hava í 1994 veitt Húsalánsgrunninum eina eykajáttan uppá kr 15.000.000 til eginpening. Játtanin er tikin av § 28 Serligar útreiðslur: Eginpeningur til almennar grunnar. (Hygg annars undir viðmerkingar til rakstrarstað 21019 effektivar veðhaldsbindingar).

Samlaða játtanin til Húsalánsgrunnin er sostatt kr. 25.000.000 í 1994.

Rakstrarstað 21019 Effektivar veðhaldsbindingar:

Á fíggjarlógini fyri 1994 var játtað kr. 50.000.000 til effektiv veðhald fyri privat virki. Men roknað verður við, at nýtslan til hetta endamál í 1994 verður kr. 65.000.000. Tað er ein meirnýtsla uppá kr. 15.000.000.

Haraftarat var játtað kr. 40.000.000 til effektiv veðhald fyri almennar grunnar og virki.

Hesar kr. 40.000.000 eru, sum greitt frá í almennu viðmerkingunum frammanfyri, á eykafíggjarløgtingslógini fyri 1994 fluttar til § 28 Serligar útreiðslur: Eginpeningur til almennar grunnar.

Av hesum kr. 40.000.000 hevur landsstýrið og fíggjarnevndin samtykt at játta :

til § 28 serligar útreiðslur:	Menningargrunnin	kr. 5.000.000
	Ídnaðargrunnin	kr. 20.000.000
og rakstrarstað 19956	Húsalánsgrunnin	kr. 15.000.000

Rakstrarstað 22206 Rentur og kurstap:
Játtanin til 22206 rentur á fíggjarlógini 1994 er kr. 551.000.000.

Eftir uppgerð frá landsbankanum 13. december 1994 verða útreiðslurnar til rentur í 1994:

At gjalda í 1994, men tilhoyrandi 1993	kr. 123.600.000
At gjalda í 1994 og tilhoyrandi 1994	kr. 247.400.000
At gjalda í 1995, men tilhoyrandi í 1994	kr. 161.760.000
Tilsamans rentur í 1994	kr. 532.760.000

og útreiðslur til **kurstap** í 1994:

At gjalda í 1994, men tilhoyrandi í 1993	kr. 77.000.000
At gjalda í 1994 og tilhoyrandi 1994	kr. 26.300.000
Tilsamans kurstap í 1994	kr. 103.300.000

Arbeitt verður við broyttum roknskaparmeginreglum soleiðis, at til og við fíggjarárinum 1995 verður mett um tíðaravmarkaðar (periodiseraðar) rentur og kurstap í árinum. Til og við 1994 var mett um goldnar rentur. Á eykafíggjarlógini og endaliga roknskapinum fyri 1994 verður gjørt upp, so at rentur og kurstap, ið viðvíkja 1993 og árinum frammanundan, verða tikin sum ein serlig útreiðsla (ekstraordinær udgift).

Sostatt verða rentur og kurstap, sum verða goldin í 1994 men hoyra til 1993 bókað á § 28 Serligar útreiðslur.

Tað eru rentur:
at gjalda í 1994, men tilhoyrandi 1993 kr. 123.600.000
og kurstap:
at gjalda í 1994, men tilhoyrandi 1993 kr. 77.000.000

§ 28 Serligar útreiðslur:
Rentur og kurstap:
Rentur at gjalda í 1994, men tilhoyrandi 1993 kr. 123.000.000.
Kurstap at gjalda í 1994, men tilhoyrandi 1993 kr. 77.000.000
(Hygg undir viðmerkingar til rakstrarstað 22206 rentur og kurstap.)

Eginpeningur til almennar grunnar:
Á upprunaligu fíggjarlógini fyri 1994 var játtað kr. 40.000.000 á rakstrarstað 21019 til effektiv veðhald fyri almennar grunnar og virki.

Á eykafíggjarlógini fyri 1994 eru hesar kr. 40.000.000 fluttar til § 28 serligar útreiðslur, sum greitt frá í almennu viðmerkingunum frammanfyri. Hygg annars eisini undir viðmerkingar til rakstrarstað 21019 effektivar veðhaldsbindingar.

Menningargrunnur ídnaðarins:
Landsstýrið og fíggjarnevndin hava í 1994 veitt Menningargrunninum kr. 5.000.000 í eykajáttan í 1994. Játtanin er tikin av § 28 serligar útreiðslur: Eginpeningur til almennar grunnar.

Føroya Ídnaðargrunnur:
Landsstýrið og fíggjarnevndin hava í árinum samtykt at veita Ídnaðargrunninum eina játtan uppá kr. 30.000.000. Játtanin er fingin til vega við at taka kr. 20.000.000 frá § 28 serligar útreiðslur: eginpeningur til almennar grunnar og at veita Ídnaðagrunninum eina eykajáttan uppá kr. 10.000.000.

Ídnaðargrunnurin fer væntandi at hava negativan eginpening uppá 11-12 milliónir krónur við árslok 1994 orsakað av rakstrarhalli og avsetingum.

Um eginpeningur grunnsins er negativur, kunnu lánveitarar grunnsins sambært lánitreytunum siga lán grunsins upp. Landsstýrið skýtur tí upp at veita grunninum nýggjan eginpening uppá kr. 15.000.000 yvir eykafíggjarlógina 1994, so eginpeningur grunnsins verður positivur.

Játtanin til Føroya Ídnaðargrunn verður sostatt kr. 45.000.000 í 1994.

1. viðgerð 2. januar 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 16. mars legði fram soljóðandi

Á l í t

Eykafíggjarløgtingslógin varð løgd fram av landsstýrinum tann 22. desember 1994. Eftir 1. viðgerð 2. januar 1995 varð málið beint í fíggjarnevndina.

Í sambandi við nevndarviðgerðina hevur fíggjarnevndin havt fundir við landsgrannskoðaran, ávísar landsstovnar og umboð fyri landsstýrið.

Á fundinum við landsgrannskoðaran varð viðgerðin av fíggjarlógini lýst í søguligum samanhangi, og ivaspurningar í sambandi við fíggjarlógararbeiði vórðu umrøddir.

Landsgrannskoðarin, Leivur Harryson, førdi fram, at seinasta veruliga nýskipan av fíggjarlógarmannagongdini hendi í 1963/64, tá fíggjarlógaruppskotið fyri 1964/65 varð lagt fram í nýggjum sniði, og harumframt varð ein eykafíggjarlóg fyri 1963/64 løgd fram.

Í løgmansrøðuni á ólavsøku 1963 varð víst til brot í grannskoðanarfrágreiðingini fyri fíggjarárið 1961/62, har tað varð hildið neyðugt, at fáa eina eykalógarskipan fyri at vera samsvarandi við § 21 í løgtingslóg nr. 1 frá 1948, sum sigur, at "eingin útreiðsla má verða goldin, tð ikki er heimilað í fíggjarlóg, galdandi, tá ið útreiðslan verður ávíst, ella aðrari galdandi heimildarlóg".

Broytingarnar í 1964/65 vóru í sjálvari rakstrarfíggjarætlanini, og eitt nýtt kapitalfíggjarlógaruppskot, sum vístu broytingar í ognum og skuldum landskassans, kom við.

Greinauppbýtið varð skipað soleiðis, sum vit í dag kenna tað. Men tá vóru allir landsstovnar við á fíggjarlógini. Í dag eru stórt sæð bert stovnar, ið hava brúk fyri veitingum, við.

Í uppskotinum frá 1964/65 vóru bruttotøl brúkt, t.v.s. at allar inntøkur og útreiðslur hjá einstøku stovnunum vóru við. Í dag verður bert arbeitt við nettotølum, t.v.s. at bert munurin millum inntøkurnar og útreiðslurnar, sum svarar til játtanartørvin, er á sjálvari fíggjarlógini.

Landsgrannskoðarin segði á fundi við fíggjarnevndina, at hann heldur ikki, at núverandi fíggjarlóg við nettotølum avspeglar virksemið í samfelagnum. Ein fíggjarlóg við bruttotølum hjá øllum landsstovnum hevði givið eina betri og rættari mynd av støðuni, segði hann.

Fíggjarnevndin tekur undir við hesum sjónarmiði, tí tað ber í dag til hjá stovnum, sum hava størri inntøkur enn væntað, at økja um útreiðslurnar, uttan at landsmyndugleikarnir verða tiknir upp á ráð ella hava góðtikið útreiðsluvøksturin.

Fleiri av grundreglunum í 1964/65-lógini verða ikki nýttar í dag. Fykafíggjarlógir vóru ikki brúktar í áttatiárunum, men síðani 1991 hava tær aftur verið fastur táttur í fíggjarlógarviðgerðini.

Ikki hevur verið gjørt nógv burtur úr meginreglum fyri hvussu ein játtan skal skiljast og hvørjar bindingar talan hevur verið um, men í álitinum frá fíggjarnevndini í løgtingsmáli nr. 10/1989: Fíggjarløgtingslóg fyri 1990 verður m.a. sagt:

"Fykajáttan verður í princippinum ikki veitt, uttan so, at heilt serligar grundir tala fyri hesum, og eftir at landsstýrið og fíggjarnevndin hava gingið slíkari umsókn á møti".

Í sama álit vóru hesar høvuðsreglur settar upp:

1. Játtanin er ein blokkur til rakstrarstaðið.
2. Játtaðar ósettar normeringar kunnu ikki setast uttan við loyvi frá landsstýrinum, og treytað av, at stovnurin kann halda seg innanfyri samlaðu játtanina hjá stovninum.
3. Ongin nýnormering verður játtað.
4. Broyting í leigumálum og EDV skipanum, leasing v.m. kann bert fremjast innan galdandi játtan og við loyvi frá landsstýrinum.

Í álitinum til fíggjarløgtingslógina fyri 1991 kom ein høvuðsregla aftrat:

5. Tað er ábyrgd stovnsleiðaranna at syrgja fyri, at givnar játtanir verða hildnar. Um - sum undantøk vegna broyttar fortreytir - ein játtan ikki kemur at halda, er tað skylda stovnsleiðaranna at siga landsstýrinum frá hesum. Landsstýrið saman við fíggjarnevndini tekur so neyðug stig.

Í álitinum til fíggjarløgtingslógina fyri 1992 vísti fíggjarnevndin á somu høvuðsreglur, sum vóru galdandi fyri 1991. Einki hevur verið nevnt um hetta í seinni fíggjarlógarálitinum, men metast má, at høvuðsreglurnar framvegis eru galdandi.

Uppá fyrispurning, um hvørji krøv eiga at verða sett til fíggjarlógina, setti landsgrannskoðarin hesi punktini upp:

1. Uppsetingin av fíggjarlógini skal verða greið, upplýsandi, væl skipað og eintýðug.
2. Innihaldið í teim einstøku játtanunum skal vera greitt og væl lýst - bæði viðvíkjandi útreiðslum og inntøkum.
3. Greitt má vera, hvørjar heimildir (skyldur) fyrisitingin hevur í sambandi við umsitingina.
4. Greiðar meginreglur mugu vera fyri roknskaparførsluni og - rapporteringini.
5. Greiðar reglur mugu vera fyri, hvussu farast skal fram í sambandi við meirnýtslu v.m.

Landsgrannskoðarin helt, at eingin av hesum fyritreytum kann sigast at vera uppfylt sum er. Hann segði, at búskapardeildin hevði biðið grannskoðanardeildina og gjaldstovuna taka stig til at gera greiðari reglur viðvíkjandi játtanum og roknskaparhaldi.

Landsgrannskoðarin vísti á, at samsvar ikki altíð er millum fylgiskjølini til fíggjarlógina og ta fíggjarlóg, sum endaliga verður samtykt. Hóast fíggjarlógaruppskotið verður broytt undir tingviðgerðini, verða fylgiskjølini ikki broytt samsvarandi.

Verandi fylgiskjalatilfarið er heldur ikki nóg gott grundarlag fyri einari játtan. Ov lítið verður gjørt burturúr at lýsa fortreytirnar fyri veitingini. Eingin lýsing er av tí virkseminum, sum politiski myndugleikin vil hava fyri peningin. Hetta kann hava við sær, at ein játtan, sum upprunaliga var ætlað til ávíst endamál, í dag verður nýtt til nakað heilt annað. Uttan virkislýsing (funktionsbeskrivelse) ber illa til at eftirkanna hesi viðurskifti.

Ein samd fíggjarnevnd tekur undir við framførdu sjónarmiðunum og mælir til at skundað verður undir arbeiðið at fáa greiðari reglur viðvíkjandi játtanum og roknskaparhaldi. Í øðrum londum liggur vegleiðingarskriv til grund fyri rakstrarætlanum hjá almennu stovnunum, og rundskriv verða regluliga send út. Tørvur er á slíkari skipan her hjá okkum.

Í sambandi við viðgerðina av eykafíggjarlógini hevur fíggjarnevndin biðið landsstýrið sundurgreina meirútreiðslurnar millum

1) Sáttmálabundnar útreiðslur (S)
2) Lógarbundnar útreiðslur og (L)
3) Meirútreiðslur við eykajáttan (E)

Fíggjarnevndin hevur fingið soljóðandi svarskriv frá landsstýrinum:

Meirútreiðslur 1994.

(rakstur)	- kr. 43.263.000
(viðlíkahald)	- kr. 358.000
(fløgur)	kr. 10.800.000
	kr. 210.600.000
Meirútreiðslur tilsamans	kr. 177.779.000
Serligar útreiðslur	- kr. 210.600.000
Minniútreiðslur á vanliga rakstrinum	kr. 32.821.000

Á vanliga rakstrinum hava sostatt verið nýttar kr. 32.821.000 minni enn játtað á fíggjarlógini 1994.

Hetta kemst lutvíst av, at ein roknskaparreglinregla er broytt á eykafíggjarlógini fyri 1994, har lagt er um frá at nýta goldnar rentur og kurstap til tíðargreindar rentur og kurstap, soleiðis sum greitt er frá í viðmerkingunum til eykafíggjarlógina 1994.

Av hesi orsøk gjørdust samlaðu útreiðslurnar kr. 115.540.000 minni enn játtað í 1994.

Uttan hesa roknskapartekniska broyting hevði meirnýtslan á vanliga rakstrinum verið:

	kr. 115.540.000
	- kr. 32.821.000
	kr. 92.719.000

Bruttoútreiðslur 1994

	Meirútreiðslur	Eykajáttan
10018 Løgtingsmenn	587.000 L	
11015 Løgmaður og landsstýri	775.000 L	
11991/253704 Útreiðslur av vali	200.000 L	
12026 Útr. viðv. Ríkissjúkrah.	6.000.000 L	
12508 Læknar	200.000 L	
12907/373305 Landsstýrinum at ráða yvir	580.000 L	
14117 Eftirlønir	400.000 L	
14967/313646 Næmingaheim, rakstrarstudningur	262.000 L	
16417 Íløgustuðul	18.000.000 L	
19106 Avlarnispensión	4.200.000 L	
19301 Einkjupensión	590.000 L	
19892 Vanlukkutryggingarráðið	500.000 L	
19873 Inntøkutrygd hjá fiskim.	12.000.000 L	
21019 Effekt. veðhaldsbind. til privat virkir	15.000.000 L	
	59.294.000 L	

10023	Nýggj tingskipan	150.000	E	150.000
10158	Løgtingsskrivstovan	250.000	E	250.000
11359	Almannastovan	700.000	E	900.000
11991/373305	Landsstýrinum at ráða yvir	800.000	E	500.000
12907/303077	Vaksinationir	700.000	E	1.167.000
14307	Tøkniúth. Norðoyardepilin	795.553	E	795.553
14378	F.Studentask. og HF-skeið	723.250	E	276.250
14409	Føroya Handilsskúli	231.000	E	213.000
14846	Skúlabókaútgáva	187.000	E	187.000
14984/313733	Maskinskúlin	5.000.000	L E	5.000.000
15983	Føroya Fornminnisavn	3.280.000	L E	3.280.000
16505	Fiskaaling (rakstur)	1.380.000	E	1.380.000
16904/333407	Tiltøk fyri alivinnuna	10.000.000	L E	10.000.000
§ 18	Partabrøv í P/F Electron	1.947.000	E	1.947.000
18551	Framtaksgrunnurin	1.000.000	E	1.000.000
190242	Serforsorg bústovnar	300.000	E	300.000
19441	Forsorgarstovnar	700.000	E	700.000
19956	Húsalánsgrunnurin	15.000.000	L E	15.000.000
19994/363532	Dagheimið á Berjabrekku	200.000	E	200.000
§ 28	Menningargrunnurin	5.000.000	L E	5.000.000
§ 28	Føroya Ídnaðargrunnur	45.000.000	L E	45.000.000
		93.343.803	E	93.245.803

10106	Løgtingsbygningur	100.000	
11898	Útskifting og matrikulstova	17.400	
13265	Strandferðsla Landsins	11.300.000	
§ 13	Viðlíkahald Útvarp, Sjónv.	342.000	
14331	Klaksvíkar HF-skeið	280.000	S
14485	Dieselmotor simulator	125.000	S
14777	Prøvtøkur	200.000	S
14986/313343	Studentaskúli á Kambsdali	610.000	S
16301	Vaktar- og bjargingartænastan	413.643	
16607	Fiskivinnuráð	80.000	
18109	Arbeiðseftirlitið	100.000	S
18323	Studningur til kolagrevstur	30.000	
18532	Ídnaðarfrembjandi endamál	2.000.000	
19436	Umsiting av hjálpitólum	200.000	S
		15.798.043	

59.294.000 L
93.245.803 E
15.798.043
168.337.846

L=Lógarbundin
S=Sáttmálabundin (her er tó í flestu førum talan um partvíst sáttmálabundnar útreiðslur.)
E=Eykajáttan

Fíggjarnevndin hevur havt fund við landsstýrið og stovnsleiðarar um frávikini, sum verða staðfest á eykafíggjarlógini. Í nógv teim flestu førunum er talan um lógarbundnar útreiðslur, partvíst sáttmálabundnar útreiðslur og útreiðslur, sum eru heimilaðar við eykajáttan.

Fíggjarnevndin ásannar, at flestallir stovnar halda seg innanfyri givnu karmarnar. Ikki slepst undan frávikum í lógarbundnu útreiðslunum, men átaluvert er, at umleið kr. 15 mió. eru nýttar uttan heimild. Fíggjarnevndin heitir á landsstýrið at taka neyðug stig til, at hetta ikki hendir aftur.

Støða fíggjarnevndarinnar er, at eykafíggjarlógin á útreiðslusíðuni bert eigur at fevna um lógarbundnar útreiðslur og um eykajáttanir, sum eru játtaðar av landsstýrinum og av fíggjarnevndini. Staðfestu heimildarleysu útreiðslurnar mugu tí metast sum umsóknir frá landsstýrinum um eykajáttan, men hesar umsóknir áttu at verið avgreiddar av landsstýrinum, áðrenn eykafíggjarlógin varð løgd fram.

Í álitinum til eykafíggjarlóg fyri 1993 undirstrikaði fíggjarnevndin, at landsstýrið eigur at søkja fíggjarnevndina um eykajáttan, so skjótt sum tørvurin verður staðfestur og ikki, sum í hesum førinum, tá ið árið verður gjørt upp.

Sum tað skilst av uppsetingini hjá landsstýrinum, eru tey týdningarmestu rakstrarstøðini, har sum peningur er brúktur uttan heimild, hesi:

13265	Strandfaraskip Landsins	kr. 11.300.000
	Viðlíkahald sjónvarpssendinet	kr. 342.000
16301	Vaktar- og bjargingartænastan	kr. 413.643
18532	Grunnur til ídnaðartr. endamál	kr. 2.000.000

Av heimildarleysu meirnýtsluni er tað serliga upphæddin uppá kr. 11,3 mió. hjá **strandferðsluni**, sum sker í eyguni. Strandferðslan var eisini við á eykafíggjarlógunum fyri 1992 og 1993, so eyðsýnt er, at strandferðslan ikki hevur havt tamarhald á fíggjarviðurskiftunum.

Meirnýtslan hjá strandferðsluni kann smb. landsstýrið útgreinast soleiðis:

Meirnýtsla	kr. 4.000.000
Uppathald av tyrlurakstri	kr. 1.100.000
IMO krøv (skipakrøv)	kr. 6.200.000

Harafturat koma smáar kr. 10 mió., sum er ófíggjað undirskot frá 1992 og 1993.

Fíggjarnevndin undrast á viðmerkingarnar hjá landsstýrinum, har víst verður til ein fund tann 26. september 1993 millum landsstýrið og strandferðsluna. Sagt verður, at á fundinum fekk strandferðslan tilsøgn um, at kostnaðurin skuldi verða goldin uttanum ársjáttanina.

Orðingin í viðmerkingunum til eykafíggjarlógina var tikin beinleiðis úr skrivi frá strandferðsluni til landsstýrið. Fíggjarnevndin hevur roynt at kanna málið, men hevur fingið upplýst, at einki referat finst í landsstýrinum frá nevnda fundi og heldur ikki á strandferðsluni.

Strandferðslan hevur svarað fíggjarnevndini, at talan er um eina misskiljing, og at orðingin "uttanum játtanina" skal skiljast soleiðis, at pláss ikki var fyri óvæntaðu meirútreiðslunum í vanliga raksturin, og tí var neyðugt við aðrari játtan.

Tann næststørsta útreiðslan, sum stendur sum heimildarleys, eru kr. 2 mió. til **Grunnin til ídnaðarfremjandi endamál.** Men talan er í hesum førinum **ikki** um heimildarleysa nýtslu.

Á fundi við Kjartan Kristiansen, stjóra fyri Menningarstovuni, sum viðger umsóknirnar til grunnin, fekk fíggjarnevndin at vita, at peningur hevur verið tøkur til allar umsóknirnar, sum landsstýrið og fíggjarnevndin hava játtað úr Grunninum til ídnaðarfremjandi endamál í 1994.

Grunnurin hevur søkt um eykajáttan, og tað er henda eykajáttan, sum komin er á eykafíggjarlógina fyri 1994. Peningurin er ikki brúktur, og kemur tí grunninum til góðar í 1995, upplýsti stjórin í Menningarstovuni.

Fíggjarnevndin heldur **ikki**, at tað er rætt at avseta pening, sum ætlanin er at brúka í 1995, á eykafíggjarlógini fyri 1994. Nevndin mælir tí tinginum til at strika hesa upphædd av eykafíggjarlógini og setir fram tilsvarandi broytingaruppskot.

Á grein 13 er meirnýtsla í sambandi við **ábøtur á sjónvarpssendinetið.** Landsstýrið greiðir í viðmerkingunum frá, at arbeiðið byrjaði í 1993, men steðgur kom í vegna vantandi peningajáttan. Tað, sum er gjørt, kostaði kr. 342.000. Landsstýrið átti at havt sent fíggjarnevndini umsókn um eykajáttan í hesum sambandi.

Á fundi við Johan Ziskason frá **Vaktar- og bjargingartænastuni** og Ivan Johannesen, landsstýrismann kom fram, at orsøkin til meirnýtsluna hjá Vaktar- og bjargingartænastu-

ni uppá 413.643 kr. var, at stovnurin ikki hevði roknað MVG við í fíggjarætlanina.

Á fundi við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, spurdi fíggjarnevndin í sambandi við rakstrarstað 323285, **Savn í Hoyvík**, um uppsetingin á eykafíggjarlógini var røtt.

Landsstýrið hevur síðani svarað, at peningurin til keyp og umbygging av Formminnissavni í Hoyvík kr. 3.280.000 skal játtast til rakstrarstað 15983/323953 Føroya Formminnissavn og ikki á rakstrarstað 15983/323945 Savn í Hoyvík, sum tað er gjørt í uppskoti landsstýrisins. Broytingaruppskot verður tí sett fram samsvarandi hesum.

Fíggjarnevndin vísir annars í sambandi við hetta rakstrarstað á, at landsstýrið í viðmerkingunum til eykafíggjarlógina skrivar, at "keyp og umbygging verður mett at kosta falt kr. 4.100.000 + kr. 520.000 í meirvirðisgjaldi". Hetta samsvarar ikki við løgtingslógina um keyp av somu ogn, tí smb. grein 2 í lógini stendur, at "Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán stórt kr. 4,1 mió. til keyp og umbygging av ognini".

Heimildin var sostatt kr. 4,1 mió. íroknað mvg og ikki uttan mvg.

Fíggjarnevndin hevur fingið bræv frá Føroya landsstýri, dagfest 18. januar 1995, har m.a. stendur:

"Landsstýrið hevur á fundi 12. januar 1995 samtykt at søkja fíggjarnevndina um eykajáttan uppá kr. 3.695.000 til alivinnuna í sambandi við dóm um endurgjald til alarar, sum ikki kundu fáa fløgustuðul til smolt, sum var alt útum givna loyvið.

Í 1993 noktaði landsstýrið at veita fløgustuðul til p/f Kaldbaks Laksaaling v/Mortani Johannesen, p/f Laksaaling v/Kristiani á Neystabø og p/f Norðaling v/Rógva Nielsen, tí teir høvdu keypt smolt frá alara, sum var alt útum givna loyvið.

Kaldbaks Laksaaling legði sak ímóti landsstýrinum, og Føroya Rættur staðfesti, at Kaldbaks Laksaaling hevði rætt til stuðul, tá hvørki í lóg ella kunngerð verður nevnt nakað um, at fløgustuðulin bert er til smolt, sum er alt innan givna loyvið.

Sostatt stendur landsstýrið fyri at skula gjalda teimum trimum alarunum fløgustuðul fyri 1993, sum tilsamans er ein upphædd uppá kr. 3.695.000."

Landsstýrið hevur heitt á fíggjarnevndina um at seta hesa upphædd á eykafíggjarlógina, og verður samsvarandi broytingaruppskot sett fram.

Landsstýrið hevur heitt á fíggjarnevndina um at broyta nøkur frávik í roknskapartølunum fyri 1993 á uppskotinum til eykafíggjarlóg fyri 1994 í mun til ársroknskapin 1993 frá Føroya Gjaldstovu. Hetta verður gjørt eftir áheitan frá grannskoðanardeild landskassans. Fíggjarnevndin ger vart við, at roknskapartølini fyri 1993 eru í álitinum rættað í mun til uppskot landsstýrisins.

Somuleiðis hevur landsstýrið heitt á fíggjarnevndina um at broyta:

Rakstrarstað 4011 Happadráttur til (í kr. 1000):

Roknskapur	Játtan 1994	Eykafl.94	Sml. játtan 1994
0	0	392	392

Rakstrarstað 6451 Landsbanki Føroya til (í kr. 1000):

Roknskapur	Játtan 1994	Eykafl.94	Sml. játtan 1994
0	1.000	-1.000	0

og verður broytingaruppskot sett fram samsvarandi við hesum.

Í sambandi við rakstrarstað 18584 **Javning móti tollverju** hevur landsstýrið hesar viðmerkingar í uppskotinum til eykafíggjarlóg:

"Játtanin til 18584 javning móti tollverju er í 1994 kr. 20.000.000. Men roknað verður við, at nýttar verða umleið kr. 9.400.000 í 1994.

Landsstýrið skjýtur upp, at peningurin kr. 11.600.000 (skal vera kr. 10.600.000), sum ikki verður brúktur í 1994 á hesum rakstrarstað, sum í uppskoti til fíggjarløgtingslóg í 1995 verður kallað menning av fiskivinnu á landi, verður sett í grunn.

Menningarstovan hevur í skrivi til landsstýrið mælt til, at stuðulin til menning av fiskivinnu á landi kemur undir aðra skipan - t.d. við eksternum grunni. Við hesum slepst eisini undan periodiseringstrupulleikum.

Hesum tekur deildin fyri fiski- og aðrari vinnu undir við og mælir tí til, at eftirverandi játtan fyri 1994 verður sett í grunn."
Ivan Johannesen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, heitti á fundi í fíggjarnevndini á nevndina um at taka undir við uppskoti landsstýrisins, soleiðis at peningurin, sum ikki verður nýttur á hesum rakstrarstaði í 1994, verður settur í grunn.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt spurningin og er samd um at mæla tinginum frá at fara undir nýggjar eksternar grunnar og vísir í hesum sambandi á viðmerkingarnar til løgtingsmál nr. 26/1990: Fíggjarløgtingslóg 1991, sum tingið hevur samtykt:

"1) Allir landskassagrunnar - uttan nøkur heilt fá undantøk - verða avtiknir og verður tí ikki talan um játtanir úr grunni longur. Orsakirnar til, at grunnarnir eru avtiknir eru fleiri:

a) Tað hevur higartil ikki verið gjørligt við ársbyrjan at vita, hvussu stórt virksemi fór at verða framt yvir grunnsjáttanir, og sostatt hevur eisini verið ógjørligt frammanundan at vita hvussu nógv gjaldførisfrágongdin úr landskassanum fór at verða í einum fíggjarári. Tað skal undirstrikast, at hetta sama er galdandi sjálvt um grunnsjáttanir

verða hildnar. Skulu politisku myndugleikarnir hava nakran møguleika at gera sær eina mynd av, hvussu stórt almenna virksemið verður í einstøku árunum, er neyðugt at seta alt tað ætlaða (byggi)virksemið í einum komandi fíggjarári á fíggjarlógina. Tað skal viðmerkjast, at hetta er tann framferðarháttur, ið verður nýttur í øðrum londum. Allar ætlaðar fløguútreiðslur í 1991 ella fløgukarmar standa tí á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1991.

b) Tað hevur higartil verið sera torført at síggja, hvussu stór nýtslan hjá landinum er í einum fíggjarári, av tí at ein munandi partur av rakstrarútreiðslunum er nýtsla úr grunninum. Í framlagda fíggjarlógaruppskoti eru allar rakstrarútreiðslur settar á sjálva fíggjarlógina."
Í somu fíggjarlóg skrivað tásitandi landsstýri, at "Landsstýrið heldur tað vera alneyðugt, at øll gjaldførisfrágongd úr landskassanum verður skrásett í fíggjarlógini, og at fíggjarlógin vísir ein komandi lánstørv."
Fíggjarnevndin heldur, at tann linjan, sum løgd varð í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 1991, skal haldast, og tekur tí ikki undir við landsstýrinum í hesum máli.

Vísandi til frammanfyristandandi viðmerkingar, mælir ein samd fíggjarnevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við niðanfyri standandi broytingum og setir sostatt fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Grein 4 Inntøkur av spæli	
Rakstrarstað 4011 Avlop av happadrátti	
verður hækkað við kr. 392.000 og sett til	kr. 392.000
Greinin verður sett til	kr. 1.092.000
Grein 6 Landsfyritøkur	
Rakstrarstað 6451 Landsbanki Føroya	
verður lækkað við kr. 1.000.000 og sett til	kr. 0
Greinin verður sett til	kr. 11.600.000
Grein 15 Mentan	
Rakstrarstað 15983/323285 Savn í Hoyvík, umv.	
verður lækkað við kr. 3.280.000 og sett til	kr. 0
Nýtt rakstrarstað 15983/323953 Føroya Fornminnissavn	
verður sett til	kr. 3.280.000

Greinin verður óbroytt.

Grein 16 Fiskivinna, sigling ot.
Rakstrarstað 16904/333407 Tiltøk til alivinnuna
verður hækkað við kr. 3.695.000 og sett til kr. 28.695.000

Greinin verður sett til kr. 146.679.000

Grein 18 Vinnulív og arbeiðsmarknaður annars
Rakstrarstað 18532 Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál
verður lækkað við kr. 2.000.000 og sett til kr. 1.500.000
Rakstrarstað 18584 Javning móti tollverju
verður lækkað við kr. 10.600.000 og sett til kr. 9.400.000

Greinin verður sett til kr. 47.117.000

Anfinn Kallsberg tekur undir við meirilutanum og hevur naraftrat hesar viðmerkingar:

Nevndin vísir í álitinum á viðmerkingar til løgtingsmál nr. 26/90: Fíggjarløgtingslóg fyri 1991, har allir landskassagrunnar - uttan nøkur heilt tá undantøk - verða avtiknir.

Nevndin mælir tí frá, at játtanin til grein 18584, "javning móti tollverju", verður játtað í grunn. Nevndin er tó ikki konsekvent, tá tað kemur til rakstrarstað 18686: "Vinnufremjandi virksemi". Hendan játtan er ætlað til at standa ímóti møguligum effektivum veðhaldum, sum landsstýrið sambært lógina hevur heimild at veita. Nevndin fyri grunnin vildi hava løgtingið at broyta lógina soleiðis, at grunnurin kundi víðka veðhaldsheimildina, men hetta uppskot er felt av løgtinginum. Í hesum sambandi hevur landsstýrismaðurin Óli Jacobsen boðað frá, at hann kemur í tingið við uppskoti um at avtaka lógina, og at peningurin skal nýtast til vinnuskapandi virksemi.

Anfinn Kallsberg heldur ikki, at heimild er at nýta játtanina á fíggjarlógini 1994 til annað endamál enn tað, ið játtanin er til.

Skal peningur nýtast til onnur endamál, má nýggj játtan útvegast til slíkt endamál. Út frá hesum setir Anfinn Kallsberg fram soljóðandi

broytingaruppskot

Grein 18 Vinnulív og arbeiðsmarknaður annars
Rakstrarstað 18686: Vinnufremjandi virksemi
kr. 25.000.000 verður strikað.

2. viðgerð 18. apríl 1995. Uppskot landsstýrisins við broytingum fíggjarnevndarinnar samtykt við 28-0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá Anfinni Kallsberg, løgtingsmanni fall við 8-0 atkvøðum.

21. apríl 1995 legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð

Fíggjarnevndin hevur fingið skriv frá Føroya landsstýri, dagfest 18. apríl 1995, har sagt verður: "Í skrivi dagfest 16. mars 1995 hevur danska forsætismálaráðið boðað landsstýrinum frá, at Danmarks Nationalbank í 1994 hevur havt eitt undirskot uppá 8,2 mia. kr. áðrenn burturleggingar, og er sostatt eingi yvirskot at útgjalda til landskassan.

Heitt verður á fíggjarnevndina um at seta á grein 7 rakstrarstað 7011 Partur av avlopi Tjóðbankans - 25.000.000 kr., eykafíggjarlógin 1994, soleiðis at samlaða játtanin verður 0 kr. í staðin fyri 25.000.000 kr.

Skrivið frá forsætismálaráðnum til Føroya landsstýri, dagfest 16. mars 1995, er soljóðandi: "Finansministeriet har i brev af 28. februar 1995 til statsministeriet meddelt følgende:

"I henhold til lov nr. 248 af 12. april 1949 skal den færøske andel af Nationalbankens overskud beregnes som en til forholdet mellem det færøske seddelomløb og det samlede sedlomløb i hele riget ved slutningen af Nationalbankens regnskabsår svarende procentdel af det beløb som tilfalder staten i henhold til lov om Danmarks Nationalbank § 19 stk. 2 og 4.

Nationalbanken havde i 1994 et underskud på 8,2 mia. kr. før henlæggelsen, hvorfor der ikke er noget overskud at udbetale til staten og dermed heller ikke til Færøerne.""
Samsvarandi hesum verður tí sett fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til
uppskot landsstýrisins

Grein 7 Partur av avlopi Tjóðbankans
Rakstrarstað 7011 Partur av avlopi Tjóðbankans
verður sett til - kr. 25.000.000

Samlað játtan á greinini verður kr. 0

3. viðgerð 21. apríl 1995. Broytingaruppskot frá fíggjarnevndini samtykt við 23-0 atkvøðum. Málið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 57 frá 18. mai 1995.

65 Avtøka av kgl. fyriskipan nr. 392 frá 3. november 1965

Ár 1994, mánadagin 2. januar 1995 legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at heitt verður á danska undirvísingarmálaráðharran at taka stig til, at greinirnar 4 - 18 f "Anordning for Færøerne om godkendelse af handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler og tilskud m.v. til disse skoler" frá 3. november 1965 verða settar úr gildi skjótast gjørligt.

Viðmerkingar:

Tá omanfyri nevnda samtykt er sett í verk, falla burtur "anordning nr. 518 af 23 september 1977 om ændring af anordning for Færøerne om godkendelse af handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmesterskoler og tilskud m.v. til disse skoler", "bekendtgørelse nr. 315 af 6. juli 1967 om ikraftsættelse på Færøerne af bestemmelse om tilskud m. v. til handelsskoler, tekniske skoler, maskinmester- og maskinistskoler" og "bekendtgørelse nr. 438 af 29. november 1967 om ikraftsættelse på Færøerne af bekendtgørelse om godtgørelse af udgifter til lærlinges befordring i forbindelse med deltagelse i undervisningen på handelsskoler og tekniske skoler."

Tær 4 rammulógirnar eru í stóran mun útfyltar við lógum v.m., sum eru neyðugar fyri virksemið á teimum ymisku útbúgvingunum.

Viðvíkjandi "Anordning for Færøerne nr. 392 af 3. november 1965 om godkendelse af handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler og tilskud til disse skoler" er at siga, at hesin bert lutvíst er farin úr gildi, nevniliga greinirnar 1-3.

Eftir er formliga at seta úr gildi restina av omanfyri nevnda "anordning", nevniliga greinirnar 4 - 18. Síðani skulu viður- skiftini hjá vinnuskúlunum skipast í samsvari við løgtingslóg nr. 58 um skúlafyrisiting frá 2. oktobur 1978, kap. 5, greinirnar 23 - 26.

Hetta merkir, at stýringin framyvir fer fram eftir føroyskari lóggávu, og í tí sambandi verða skiftisreglurnar í gomlu donsku skipanini at seta úr gildi.

Viðmerkjast skal til seinast, at sambært skrivi frá Ríkisum- boðnum, dagf. 16. juni 1992, er at siga, at "Bestemmelserne i disse paragraffer ophørte imidlertid i realiteten med at have virkning fra 1. januar 1988, hvor bloktilskudsreformen efter aftale af 9. marts 1987 mellem den danske regering og landsstyret blev iværksat".

1. viðgerð 16. januar 1995. Málið var beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. januar 1995 og varð við 1. viðgerð tann 16. januar 1995 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Mentannar- og skúlanevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hava niðanfyri standandi verið á fundi og givið frágreiðing til nevndina.

1. Eilif Samuelsen, landsstýrismaður í skúlamálum.
2. Umboð fyri landsskúlafyrisitingina.
3. Umboð fyri tekniska skúlan í Havn.
4. Umboð fyri lærararnar við tekniska skúlan í Havn.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jógvan A. Johannesen, Óli Breckmann og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Meirilutin ynskir tó, at vinnuni verður tryggjað ávirkan á innihaldið í undirvísingini í vinnuskúlunum, og setir tí fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum til komandi tingsetu, at leggja fyri tingið lóggávu sum tryggjar, at vinnulívið fær ávirkan á innihaldið og skipanina í frálæruni í vinnuskúlunum.

Minnilutin (Signar á Brúnni) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, og mælir til at samtykkja tað.

Minnilutin (Kristian Magnussen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 19. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

22. mai 1995. Uppskot landsstýrisins samtykt við 23-0 atkvøðum. Nevndarinnar uppskot til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum.

66 Løgtingslóg um landskassans innlán og lán í Landsbankanum

Ár 1994, mikudagin 4. januar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um landskassans innlán og lán í Landsbankanum.

§ 1. Endamálið við hesi lóg er at skapa fortreytir fyri, at

a) landskassin altíð hevur neyðugt tiltaks-

lagtingslov om landskassens indlån og lån i Landsbanken.

§ 1. Formålet med denne lov er at skabe forudsætninger for, at

a) landskassen altid har tilstrækkelig

gjaldføri, soleiðis at hann kann rinda sínar rokningar,
b) at landskassans ogn og skuld verður fyrisitin so væl sum gjørligt,
c) landskassin lænir til sín fíggingartørv fyri marknaðarkor.

§ 2. Landsstýrinum verður álagt landskassans vegna at hava innlán í Landsbankanum, sum í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári.
Stk. 2. Í august ásetir Landsbankin minstuupphæddina fyri komandi ár út frá seinast kunngjørdu tjóðarrokniskaparuppgerð. Upphæddin verður nevnd minstainnlánið.

§ 3. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán í Landsbankanum, sum svarar til fulla minstainnlánið.
Stk. 2. Um Landsbankin hevur veitt veð ella aðra trygd fyri skyldur hjá landskassanum, kunnu lánini til landskassan og trygdirnar fyri skyldur hjá landskassanum ikki fara uppum minstainnlánið.
Stk. 3. Henda lántøkuheimild kemur aftrat teimum heimildum, sum løgtingið annars samtykkir.
Stk. 4. Landskassalánsbrøv, noterað á Københavns Fondsbørs ella á líknandi sølutingi, sum Landsbankin eigur, verða ikki roknað sum partur av lánunum eftir hesi lógargrein.

§ 4. Landskassans lán úr Landsbankanum saman við trygdum frá Landsbankanum (smb. § 3) skulu ikki vera meira enn 70% av minstainnláninum í meira enn 6 mánaðir.
Stk. 2. Tað verður álagt landsstýrinum at útvega pening til at minka um lántøkuna í Landsbankanum, tá lán og trygdir samanhangandi hava verið meira enn 70% av

likviditetsreserve, således at den kan klare sine betalingsforpligtelser,
b) landskassens aktiver og gæld administreres bedst muligt,
c) landskassen dækker sin finansieringsbehov ved lån på markedsvilkår.

§ 2. Det pålægges landsstyret på landskassens vegne at have indlån i Landsbanken, der mindst svarer til 15% af bruttonationalproduktet i det foregående år.
Stk. 2. I august fastsætter Landsbanken minimumsbeløbet for det kommende år ud fra den senest bekendtgjorte nationalregnskabsopgørelse. Dette beløb benævnes mindsteindlånet.

§ 3. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån i Landsbanken svarende til det fulde mindsteindlån.
Stk. 2. Hvis Landsbanken har bevilget garanti eller anden sikkerhed for landskasseforpligtelser, må lånene til landskassen og sikkerheder for landskasseforpligtelser ikke overstige mindsteindlånet.
Stk. 3. Denne bemyndigelse til optagelse af lån kommer i tillæg til de bemyndigelser til optagelse af lån, som lagtinget i øvrigt vedtager.
Stk. 4. Landskasseobligationer, noteret på Københavns Fondsbørs eller anden lignende børs, som landskassen ejer, indgår ikke som en andel af lånene ifølge denne lovparagraf.

§ 4. Landskassens lån fra Landsbanken tilsammen med sikkerheder fra Landsbanken (jfr. § 3) må ikke overstige 70% af mindsteindlånet i mere end 6 måneder.
Stk. 2. Det pålægges landsstyret at tilvejebringe penge til at formindske låntagningen i landsbanken, når lån og sikkerheder sammenhængende har oversteget 70% af mindsteindlånet i 6 måneder,

minstainnláninum í 6 mánaðir, soleiðis at lán og trygdir frá Landsbankanum verða minni enn 70% av minstainnláninum.

§ 5. Landsbankin ásetir rentu fyri innlán og útlán. Landsbankin kann ikki átaka sær rentutap av hesum peningi.
Stk. 2. Landsbankin ásetir treytir fyri og hvørjar konti landskassin og landsstovnar kunnu hava í peningastovnum og postgiro til inngjaldingar og útgjaldingar.

§ 6. Landsbankin umsitur landskassans lán og lántøku.
Stk. 2. Landsstýrið samsýnir Landsbankanum við provisión fyri hetta arbeiði sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Landsbankan.

§ 7. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 48 frá 28. apríl 1992.

Viðmerkingar:

Landskassans gjaldføri verður í dag umsitið av landsbankanum. Henda umsiting er undir útbygging.

Løgtingslóg nr. 48 frá 1992 ásetir reglur fyri landskassans innlán og lán í landsbankanum. Sambært sáttmála við landsstýrið umsitir landsbankin lántøkuna fyri landsstýrið.

Í løgtingslógini eru ásetingar um, hvussu landsbankin inngongur í millumverandi millum landskassan og bankarnar. Harumfram hevur landsbankin veitt trygd til Sjóvinnubankan og Føroya Banka fyri skyldur hjá landskassanum.

Tá landsbankalógin varð samtykt í 1978, var tað ætlanin, at grunnar landskassans skuldu hava sínar pengar innistandandi í landsbankanum, og at landsbankin skuldi virka við hesum peningi og tøka peningi landskassans.

Í mars mánaði 1992 vórðu nógvir av grunnum landskassans avtiknir við lóg, og í apríl sama ár varð lógin um innlán og lán í landsbankanum samtykt. Hesar lógarbroytingar

således at lån og sikkerheder sammenhængende har overstiget 70% af mindsteindlånet i 6 måneder, således at lån og sikkerheder fra Landsbanken udgør mindre end 70% af mindsteindlånet.

§ 5. Landsbanken fastsætter rente af indlån og udlån. Landsbanken kan ikke påtage sig rentetab af disse midler.
Stk. 2. Landsbanken fastsætter betingelser for og hvilke konti landskassen og landsinstitutioner må have i pengeinstitutter og postgiro til indbetalinger og udbetalinger.

§ 6. Landsbanken administrerer landskassens lån og lånoptagelse.
Stk. 2. Landsstyret yder landsbanken en provision for dette arbejde efter overenskomst mellem Færøernes Landsstyre og Landsbanken.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 48 af 28. april 1992.

vórðu gjørdar í forstáilsi við peningastovnarnar.

Eftir lógini skal landskassin hava minst 15% av BTÚ innistandandi í landsbankanum. Upphæddin á minsta innláninum verður reguleráð einaferð um árið, og kann í løtuni setast til 750 mió.kr., tó skal miðal lántøkan fyri 12 mdr. ikki fara uppum 1/4 av minsta innláninum ella p.t. 187,5 mió. kr. (§ 2, stk. 2 og 3).

§ 2 í lógini sigur:
"**§ 2.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán úr Landsbankanum, sum svarar til helvtina av minstuupphæddini í innláninum.
Stk. 2. Landskassans miðallántøka pr. dag í einum 12 mánaða skeiði skal tó ikki fara uppum fjórðingin av minstuupphæddini í innláninum.
Stk. 3. Hendan lántøkuheimildin kemur aftrat teimum lántøkuheimildum, sum løgtingið annars samtykkir.
Stk. 4. Um landskassans innlán í Landsbankan eru størri enn minstaupphæddin, kann landskassin við heimild í vanligum lántøkulógum læna av meirinnláninum við einum øðrum parti enn av minstuupphæddini. Landsbankin ásetir, hvussu nógv í teimum førum, tá parturin ikki er lógarfestur."

Parturin, sum landskassin kann læna, kann økjast, um innlán landskassans verður størri enn minstainnlánið (§ 2. stk. 4). Hetta krevur tó, at landskassin hevur neyðugu lántøkuheimild, og at landsbankin góðtekur, at landskassin kann læna meira enn 100% av eykainnláninum.

Verandi lóg hevur eisini tillagingarreglur, sum áleggja landsbankanum at hava pening innistandandi í peningastovnunum.

Bankarnir vóru í 1992 illa fyri við tøkum peningi, og ásetingarnar um landsbankans innlán í bankunum, eins og avmarkingarnar í lántøku landskassans í landsbankanum skulu síggjast í hesum ljósi.

Fíggjarstøðan í dag er tann beint øvugta av tí hon var á vári 1992. Peningastovnarnir hava ríkiligt av tøkum peningi, meðan landskassin hevur trupult at fíggja sítt virksemi.

Tað er framvegis skilagott at hava eina skipan, har landskassin er noyddur at hava eitt tiltaksgjaldføri. Hinvegin eigur landskassin at kunna útnytta ein størri part av sínum innlánum í landsbankanum.

Við tí í huga, at gjalførisviðurskiftini í samfelagnum eru avgerandi broytt, síðan verandi lóg varð samtykt 28. apríl 1992, skjýtur landsstýrið upp at broyta lógina soleiðis, at lán landskassans úr landsbankanum saman við trygdum frá landsbankanum skulu ikki verða meira enn 70% av minstainnláninum í meira enn 6 mánaðir.

Hetta er í tráð við tilmæli frá dansk-føroysku nevndini, sum landsstýrið og danska stjórnin settu at kanna føroyska kapitalmarknaðin, sum á síðu 64 í álitinum "Færøske kapitalmarkeds- og likviditetsforhold" frá juli 1994, millum annað sigur: "Indskuddet

fungerer som en tvungen likviditetsreserve, som landsstyret kan trække på inden for visse tidsmæssige og beløbsmæssige grænser. Da de beløbsmæssige grænser til dels blev fastsat under indtryk af pengeinstitutternes daværende meget stramme likviditet, bør det ved en eventuel revision af landsbankelovene overvejes, om man ikke skal udvide landsstyrets adgang til at anvende sit indskud i Landsbanken. Der kan desuden være god anledning til - ligesom i EU-landene - at fastsætte, at landsstyret må finansiere et eventuelt underskud på markedsmæssige vilkår".

Lógaruppskotið er eisini í tráð við tað, sum ráðgevandi nevndin hjá danska forsætismálaráðnum sigur á síðu 3 í síni seinastu frágreiðing: "Det er udvalgets opfattelse, at bestemmelserne i lovgivningen om binding af likviditet i Landsbanken bør ophæves, således at landskassens indestående i videst mulig omfang kan indgå i Landskassens likviditet".

1. viðgerð 16. januar 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 27. januar legði soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 4. januar 1995 og eftir 1. viðgerð tann 16. januar 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini havt fund við Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í fíggjarmálum og Sigurð Poulsen, landsbankastjóra, ið greiddu nevndini frá málinum. Landsbankastjórin upplýsti, at danski tjóðbankin og danska stjórnin arbeiða eftir somu reglum, sum lógaruppskotið ásetir. Nevndin heldur, at orðingin í § 3 stk. 4 er ógreið og kann misskiljast og samsvar er ikki millum føroyska og danska tekstin. Skotið verður upp at gera nýggja orðing til hetta stykkið. Við hesi broyting mælir **ein samd nevnd** løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir tí fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 3. stk. 4. verður orðað soleiðis:
"**Stk. 4.** Landskassalánsbrøv, sum landsbankin eigur og sum eru noterað á Københavns Fondsbørs ella á líknandi sølutingi, verða ikki roknað sum partur av lánunum eftir hesi lógargrein."

§ 3. stk. 4. formuleres således:
"**Stk. 4.** Landskassaobligationer, som Landsbanken ejer og som er noteret på Københavns Fondbørs eller anden lignende børs, indgår ikke som en andel af lånene ifølge denne lovparagraf."

2. viðgerð 31. januar 1995. Broytingaruppskot nevndarinnar samtykt við 29-0. Uppskotið soleiðis broytt samtykt við 29-0 atkvøðum.

3. viðgerð 14. februar 1995. Málið endaliga samtykt við 28-0.

Lóg nr. 31 frá 21. februar 1995.

67 Løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald

Ár 1995, mikudagin 4. januar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald</u>.

§ 1. Av teim í § 2 nevndu ognum verður goldið rentuavgjald ella fíggjarognaravgjald til landskassan.

§ 2. Avgjaldsskyldan eftir hesi lóg fevnir um:

1) Ogn, ið er innistandandi á konti í føroyskum peningastovnum og postgiro, eftirlønarskipanir í føroyskum peningastovnum samb. §§ 1C og 1D í rentutryggingarlógini, lívstryggingar og eftirlønarskipanir í føroyskum tryggingarfelag samb. §§ 1, 1A og 1B í rentutryggingarlógini.
2) Ognarvinningur av ogn, ið er innistandandi á konti í útlendskum peningastovnum, herundir eisini ognar-

<u>lagtingslov om renteafgift og afgift af finansielle aktiver</u>.

§ 1. Af de i § 2 nævnte formuer betales renteafgift eller afgift af finansielle aktiver til landskassen.

§ 2. Afgiftspligten efter denne lov omfatter:

1) Formue, som er indestående på konti i færøske pengeinstitutter og postgiro, pensionsordninger i færøske pengeinstitutter efter §§ 1C og 1D i renteforsikringsloven, livsforsikringer og pensionsopsparinger i færøsk forsikringsselskab efter §§ 1, 1A og 1B i renteforsikringsloven.
2) Formueafkast af formue, som er indestående på konti i udenlandske pengeinstitutter, derunder også for-

vinningur av eftirlønarskipanum samb. §§ 1C og 1D í rentutryggingarlógini.

3) Virðisbrøv sbr. § 1 í Virðisbrævaskattalógini.

Undantikin eru tó:

a) partabrøv og lutaprógv í felløgum skrásett í Føroyum, sbr. § 1 nr. 8) í skattalógini,

b) pantibrøv og onnur skuldarbrøv, ið eru útskrivað í sambandi við kundaútlán hjá fíggingarstovni við føstum rakstrarstaði í Føroyum.

§ 3. Avgjaldsskyldan av ogn fevnd av § 2, nr. 1 liggur á øllum kontohavarum og tryggingartakarum, tó undantikið:

1) persónar, sum ikki koma undir skattskyldu í Føroyum eftir § 1, nr. 1) í skattalógini,

2) útlendsk felløg og útlendskir felagsskapir v.m. ið ikki koma undir skattskyldu eftir skattalógini,

3) danska ríkið,

4) landskassi Føroya,

5) tær stovnanir, har ið inntøkur og útløgur eru fyriskipaðar í fíggjarlógum danska ríkisins ella løgtingsins og virki og stovnar, sum landið eigur, og sum verða riknir fyri landskassans rokning,

6) kommunur,

7) virki og stovnanir, sum eru ogn kommununnar, og sum verða rikin fyri kommununanna rokning,

8) Tjóðbanki Danmarkar,

9) Landsbanki Føroya,

10) Arbeiðsloysisskipanin,

11) Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin,

12) aðrir almennir grunnar, ið eru skipaðir við løgtingslóg og Barnahjálpargrunnurin,

13) peningastovnar við føstum rakstrarstaði í Føroyum, Tryggingarsambandið Føroyar, allar deildir tess og Føroya Lívstrygging.

mueafkast af pensionsopsparinger efter §§ 1C og 1D i renteforsikringsloven.

3) Værdipapirer jfr. § 1 i Virðisbrævaskattalógini.

Undtaget er dog:

a) aktier og andelsbeviser i selskaber, indregistrerede på Færøerne jfr. § 1, nr. 8), i skatteloven,

b) pantebreve og andre gældsbreve, der udskrives i forbindelse med kundeudlån fra financieringsinstitutter med fast driftssted på Færøerne.

§ 3. Afgiftspligten for formue omfattet af § 2, nr. 1 påhviler alle kontohavere og forsikringstagere med undtagelse af:

1) personer, som ikke har skattepligt på Færøerne i henhold til § 1, nr. 41 i skatteloven,

2) udenlandske selskaber og udenlandske foreninger m.v., som ikke er skattepligtige i henhold til skatteloven,

3) staten,

4) Færøernes landskasse,

5) de institutioner, hvis indtægter og udgifter bestemmes ved rigets eller de færøske finanslove, samt virksomheder og institutioner, der ejes af lagtinget og som drives for landskassens regning,

6) kommuner,

7) virksomheder og institutioner, der ejes af kommunerne og som drives for kommunernes regning,

8) Danmarks Nationalbank,

9) Landsbanki Føroya,

10) Arbeiðsloysisskipanin,

11) Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin,

12) andre offentlige fonde, som er foreskrevet ved lagtingslov og Barnahjálpargrunnurin,

13) pengeinstitutter med fast driftssted på Færøerne, Tryggingarsambandið Føroyar, alle dets afdelinger og Føroya

§ 4. Avgjaldsskyldan av ognarvinningi av ogn fevnd av § 2, nr. 2 og avgjaldsskyldan fyri ogn fevnd av § 2, nr. 3 liggur á øllum, skattskyldugum, nevnd í § 1 í skattalógini, og sum hava skattligan heimstað í Føroyum. Undantikin frá avgjaldsskyldu eftir hesi grein eru tó teir í § 3, nr. 13 nevndu peningastovnar og tryggingarfeløg.

Stk. 2. Hisini hava Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, Færøernes Realkreditinstitut og Fíggingargrunnurin fyri 1992 skyldu at rinda rentuavgjald av ognarvinningi av ogn teirra, fevnd av § 2, nr. 2 og ognaravgjald av ogn teirra fevnd av § 2, nr. 3.

§ 5. Avgjaldsgrundarlagið fyri tær í § 2, nr. 1 nevndu ognir fevnir um tær peninganøgdir, sum bera eina og hvørja rentutilskriving á konti innskjótaranna, uttan mun til hvat slag av konto talan er um, tó ikki ogn innistandandi á :

1) konti fyri bundnari uppsparing sambært løgtingslóg nr. 70 frá 3. juli 1989 um bundna uppsparing,
2) klientkonti hjá advokatum,
3) upphæddir, ið standa í Yvirformyndariinum.

Stk. 2. Kontohavararnir bera avgjaldið, men verður tað av peningastovni ella postgiro kontohavarans vegna rindað beinleiðis í landskassan burturav tí tilskrivaðu rentuni á tí konto, ið avgjaldið viðvíkur.

Stk. 3. Fíggjarognaravgjaldið verður rindað av tilskrivaðu rentuni, eftir at hon er minkað við rentuskatti sambært løgtingslóg nr. 87 frá 5. juni 1992 um rentuskatt jvb. tó § 6.

Stk. 4. Avgjaldsupphædd kravd eftir stk. 2 skal av avvarðandi peningastovni ella postgiro í seinasta lagi 15. í mánaðinum aftaná eina og hvørja rentutilskriving avroknast til landskassan. Peningastovnar og

§ 4. Afgiftspligten for formueafkast af formue omfattet af § 2, nr. 2 og formue omfattet af § 2, nr. 3 påhviler alle skattepligtige, nævnt i § 1 i skatteloven, og som har skattemæssigt hjemsted på Færøerne. Undtaget fra afgiftspligten i henhold til denne bestemmelse er dog de i § 3, nr. 13 nævnte pengeinstitutter og forsikringsselskaber.

Stk. 2. Endvidere påhviler det Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, Færøernes Realkreditinstitut og Finansieringsfonden af 1992 pligt til at betale renteafgift af formueafkastet af deres formuer, omfattet af § 2, nr. 2 og formueafgift af deres formue, omfattet af § 2, nr. 3.

§ 5. Afgiftsgrundlaget for de i § 2, nr. 1 nævnte formuer omfatter det kapitalbeløb, der danner basis for enhver rentetilskrivning på indskyderne konti, uanset kontoform dog med undtagelse af:

1) konti for bunden opsparing i henhold til lagtingslov nr. 70 af 3. juli 1989 om bunden opsparing,
2) advokaters klientkonti,
3) beløb indestående i Overformynderiet.

Stk. 2. Afgiften påhviler kontohaverne, men betales direkte på kontohavernes vegne til landskassen af pengeinstituttet og postgiro af den tilskrevne rente på den konto, afgiften vedrører.

Stk. 3. Afgiften betales af den tilskrevne rente, efter at denne er reduceret med renteskat i henhold til lagtingslov nr. 87 af 5.juni 1992 om renteskat, jfr. dog § 6.

Stk. 4. Opkrævet afgiftsbeløb i henhold til stk. 2 skal af pågældende pengeinstitut eller postgiro senest 15. i måneden efter en og hver rentetilskrivning være afregnet til landskassen. Pengeinstitutter og postgiro skal samtidigt indgive en opgørelse over de opkrævede afgiftsbeløb, bl.a. med oplysning om kontohavernes navne, konto-

postgiro skulu samstundis lata Toll- og Skattstovuni yvirlit yvir kravdu avgjøldini, við m.a. upplýsingum um nøvn á kontohavarum, kontosløg og rentustig. Landsstýrið kann við kunngerð áseta neyvari reglur fyri upplýsingarskylduni hjá peningastovnum og postgiro eftir hesum stk.

Stk. 5. Verða avgjøldini ikki goldin landskassanum rættstundis, skal avvarðandi peningastovnur ella postgiro gjalda 1,5% í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá og við forfalsdegnum at rokna.

Stk. 6. Í førum, har konto er verðin uppgjørd í tí tíðarskeiði, lógin fevnir um, men har peningastovnur ikki hevur kravt avgjaldið, útskrivar og krevur Toll- og Skattstova Føroya landskassans vegna avgjaldið eftir hesi lóg. Gjaldsfreistin fyri tílík krøv verður sett til 1. í mánaðinum eftir, at kravið er útskrivað. Um kravið ikki verður goldið rættstundis, verða rentuásetingarnar í stk. 5 at galda fyri hesi krøv.

§ 6. Fyri tær í § 2, nr. 1 nevndu lívstryggingar og eftirlønarskipanir í tryggingarfeløgum fevnir avgjaldsgrundarlagið um tað til cina og hvørja tíð uppsparda virðið íroknað tillutað bonus.

Stk. 2. Tryggingartakararnir bera avgjaldið, men verður tað av avvarðandi tryggingarfelag tryggingartakarans vegna rindað beinleiðis í landskassan burturav tí árliga góðskrivaða ognarvinninginum á viðkomandi tryggingaravtalu fyri viðkomandi tíðarskeið.

Stk. 3. Avgjaldið, ið tryggingarfelag krevur eftir hesum reglum, skal avroknast til landskassan eftir reglunum í § 5, stk. 4 og 5.

§ 7. Avgjaldsgrundarlagið fyri tær í § 2, nr. 2 nevndu ognir fevnir um ognarvinning á konti innskjótaranna uttan mun til, hvat slag av konto talan er um.

Stk. 2. Kontohavarar, ið eru undir avgjaldsskyldu eftir § 4, hava skyldu til at

form og rentesats til Toll- og Skattstovan. Landsstyret kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for pengeinstitutternes og postgiros oplysningspligt efter dette stk.

Stk. 5. Betales afgifterne ikke rettidigt til landskassen, skal pågældende pengeinstitut eller postgiro betale 1,5% i månedlig rente for hver påbegyndt måned fra forfaldsdagen at regne.

Stk. 6. I tilfælde hvor konto er opgjort i den periode loven omfatter, og hvor pengeinstitutter ikke har atkrævet afgift, udskriver og opkræver Toll- og Skattstova Føroya på vegne af landskassen afgiften i henhold til denne lov. Betalingsfristen sættes til 1. i måneden efter at kravet er udskrevet. Betales afgiften ikke rettidigt, er renteregelerne i stk. 5 gældende for disse krav.

§ 6. For de i § 2, nr. 1 nævnte livsforsikringer og pensionsopsparinger i forsikringsselskaber omfatter afgiftsgrundalaget det til enhver tid opsparede værdi inclusivt godskrevet bonus.

Stk. 2. Afgiften påhviler forsikringstagerne, men betales af forsikringsselskabet på forsikringshavernes vegne til landskassen af det årligt godskrevne formueafkast på pågældende forsikringsaftale for vedkommende periode.

Stk. 3. Afgiften som forsikringsselskabet opkræver efter disse regler, skal afregnes til landskassen efter reglerne i § 5, stk. 4 og 5.

§ 7. Afgiftsgrundlaget for de i § 2, nr. 2 nævnte formuer omfatter formueafkast på indskydernes konti uanset kontoform.

Stk. 2. Kontohaverne, som der påhviler afgiftspligt i henhold til § 4, har pligt til at opgive den i § 2, nr. 2 nævnte formueaf-

geva tann í § 2, nr. 2 nevnda ognarvinning upp til skattingar í seinasta lagi 15. februar og 15. august svarandi til rentutilskrivingina pr. 1. januar og 1. juli við at lata Toll- og Skattstovuni uppgerð av inntøkuni og skjalprógvi fyri ognarvinninginum og hvaðani hann stavar. Fer rentutilskrivingin av ognarvinningi bert fram eina ferð um árið, er freistin at lata uppgerð inn 15. februar aftaná rentutilskrivingina.

Stk. 3. Toll- og Skattstovan skrivar vegna landskassan út rokning uppá fíggjarognaravgjald av ognarvinningi við forfalsdegi til 1. í mánaðinum eftir, at uppgerðin er latin inn við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum.

Stk. 4. Verður avgjaldið ikki goldið landskassanum rættstundis, skal rindast 1,5% í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá og við forfalsdegnum at rokna.

§ 8. Avgjaldsgrundarlagið fyri tey í § 2. nr. 3 nevndu virðisbrøv fevnir um virðið á øllum avgjaldsskyldugum virðisbrøvum sambært § 2 nr. 3.

Stk. 2. Tá talan er um børsnoterað virðisbrøv, er virðisgrundarlagið til útrokning av fíggjarognaravgjaldinum, kursvirðið.

Stk. 3. Tá talan er um virðisbrøv, ið ikki eru børsnoterað, er virðisgrundarlagið til útrokning av fíggjarognaravgjaldinum áljóðandi virðið, um ikki mett verður, at virðið er annarleiðis. Virðisásetingin kann í slíkum førum verða ásett eftir kursvirðisreglum, ið Toll- og Skattstovan ásetir.

Stk. 4. Avgjaldsskyldug lata í seinasta lagi 15. februar Toll- og Skattstovuni uppgerð, ið sýnir avgjaldsgrundarlagið til áseting av fíggjarognaravgjaldinum. Landsstýrið kann við kunngerð seta neyvari reglur fyri slíkum uppgerðum.

Stk. 5. Toll- og Skattstovan skrivar út rokning fyri landskassans krøv uppá fíggjarognaravgjald av virðisbrøvum við forfalsdegi til 1. í mánaðinum eftir, at uppgerðin er latin inn við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum.

kast til beskatning senest 15. februar og 15. august svarende til rentetilskrivningen pr. 1. januar og 1. juli, ved at indgive opgørelse til Toll- og Skattstovan over indtægten og med dokumentation for formuevæksten og hvorfra denne hidrører. Såfremt rentetilskrivning af formueafkastet kun er en gang om året, er fristen for indgivelse af opgørelse 15. februar efter rentetilskrivningen.

Stk. 3. På landskassens vegne udskriver Toll- og Skattstovan regning for renteafgift af formueafkast med forfaldsdato til 1. i måneden efter, at opgørelsen er sendt ind med betalingsfrist til 20. i måneden.

Stk. 4. Betales afgiften ikke rettidigt til landskassen, skal der betales 1,5% i månedlig rente for hver påbegyndt måned fra forfaldsdagen at regne.

§ 8. Afgiftsgrundlaget for de i § 2, nr. 3 nævnte værdipapirer omfatter værdien på alle de i henhold til § 2, nr. 3 afgiftspligtige værdipapirer.

Stk. 2. Værdien af værdipapirer til brug for udregning af afgiftsgrundlaget for afgiften af værdipapirer ansættes, for så vidt de er børsnoterede efter kursværdien.

Stk. 3. For så vidt værdipapirerne ikke er børsnoterede, er værdien til brug for udregning af afgiftsgrundlaget for afgiften værdipapirernes pålydende, medmindre det skønnes, at deres værdi er forskellig derfra. Værdiansættelsen kan i disse tilfælde ansættes efter kursværdiregler som Toll- og Skattstovan fastsætter.

Stk. 4. De afgiftspligtige skal senest 15. februar indgive opgørelse til Toll- og Skattstovan, som viser afgiftsgrundlaget for udregning af afgiften. Landsstyret kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for opgørelsen.

Stk. 5. På vegne af landskassen udskriver Toll- og Skattstovan regning for formueafgift af værdipapirer med forfaldsdato til 1. i måneden efter, at opgørelsen er indsendt

Stk. 6. Verður avgjaldið ikki goldið landskassanum rættstundis, skal gjaldast 1,5% í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá og við forfalsdegnum at rokna.

§ 9. Um avgjaldsskyldugur ikki letur inn uppgerð, so sum fyriskrivað er í §§ 7 og 8, er Toll- og Skattstovu Føroya heimilað at skriva út rokning grundað á meting av avgjaldsgrundarlagnum. Landsstýrið kann við kunngerð fyriskriva neyvari reglur fyri meting eftir hesum reglum.

§ 10. Fíggjarognaravgjaldið fyri ogn sambært § 2, nr. 1 er 0,6% p.a. roknað av teim peninganøgdum, sum bera eina og hvørja tilskrivaða bruttorentu ella annan ognarvinning, tó hægst 7/8 av netto ognarvinninginum. Nettoognarvinningur merkir her tilskrivaður bruttoognarvinningur lækkaður við galdandi rentuskattaprosenti sambært rentuskattalógini, jvb. tó stk. 2.

Stk. 2. Av eftirlønarskipanum og lívstryggingum sambært § 2, nr. 1 verður fíggjarognaravgjaldið avmarkað til 7/8 av ávikavist rentutilskrivingini í peningastovnum og bonustilskrivingini í tryggingarfelag.

§ 11. Rentuavgjaldið av ognarvinningi sambært § 2, nr. 2 er 15% av ognarvinninginum.

§ 12. Fíggjarognaravgjaldið fyri ogn sambært § 2, nr. 3 er 0,6% av virðinum á virðisbrøvum pr. 31.12. í hvørjum álmanakkaári, tá virðisbrøvini eru ogn pr. 31.12. og hava verið ogn hins avgjaldsskylduga alt árið. Um virðisbrøvini bert hava verið ogn hjá tí avgjaldsskylduga ein part av árinum, verður avgjaldið uppá 0,6% at minka lutfalsliga svarandi til lutfallið millum ognartíðina og álmanakkaárið. Tað sama er galdandi, tá talan er um

og med betalingsfrist til 20. i måneden.

Stk. 6. Betales afgiften ikke rettidigt til landskassen, skal der betales 1,5% i månedlig rente for hver påbegyndt måned fra forfaldsdagen at regne.

§ 9. Såfremt afgiftspligtig ikke indsender opgørelse som foreskrevet i §§ 7 og 8, er Toll- og Skattstova Føroya bemyndiget til at udstede regning på grundlag af skønsmæssigt ansat afgiftsgrundlag. Landsstyret kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for skønsmæssige ansættelser efter disse regler.

§ 10. Afgiften på formue i henhold til § 2, nr. 1 er 0,6% p.a. beregnet af de kapitalbeløb, der danner basis for en og hver bruttorentetilskrivning eller andet formueafkast, dog højst 7/8 af det tilskrevne nettoafkast. Nettoafkastet er her bruttoafkastet reduseret med gældende renteskatteprocent i henhold til renteskatteloven, jfr. dog stk. 2.

Stk. 2. Af pensionsopsparinger og livsforsikringer efter § 2, nr. 1 begrænses afgiften til henholdsvis 7/8 af rentetilskrivningen i pengeinstitutter og bonustilskrivninger i forsikringsselskaber.

§ 11. Renteafgiften af formueafkast i henhold til § 2, nr. 2 er 15% af formueafkastet.

§ 12. Afgiften for finansielle aktiver i henhold til § 2, nr. 3 er 0,6% af værdien på værdipapirerne pr. 31.12 i hvert kalenderår, såfremt værdipapirerne er ejendom pr. 31.12 og har været det hele kalenderåret. Såfremt værdipapirerne kun har været den afgiftspligtiges ejendom en del af året, reduceres afgiften på 0,6% forholdsmæssigt svarende til forholdet mellem ejendomsperioden i kalenderåret og kalenderåret. Det samme er gældende, såfremt

sølu í árinum. Avgjaldið verður tá goldið av virðinum við sølu og í lutfalli, sum ásett í pkt. 2. Virðið verður uppgjørt sum í § 8, stk. 2 og 3 ásett.
Stk. 2. Fíggjarognaravgjald samb. § 2, nr. 3 verður ikki kravt av premiulánsbrøvum hjá privatpersónum um samlaða árliga áljóðandi virðið er 2.500 kr. ella minni.

§ 13. Fíggjarognaravgjald og rentuavgjald eftir hesi lóg kann ikki dragast frá í skattskyldugari inntøku.

§ 14. Toll- og Skattstovan umsitur og innkrevur avgjøld eftir hesi lóg. Toll- og Skattstovan fær í samband við umsitingina av lógini sonu heimildir til eftirlit og aðrar søndir sum í skattalógini fyriskrivað fyri skattaeftirlit.

§ 15. Landsstýrið kann við kunngerð áseta nærri reglur um fyrisitingina av hesi lóg, og kann m.a. áseta reglur, sum skulu tryggja, at ogn ella inntøkur ikki kunnu flytast frá tíðarskeiðinum, hendan lóg er galdandi fyri.

§ 16. Føroya Gjaldstova kann eftir áheitan frá Toll- og Skattstovuni innheinta við panting fíggjarognar- og rentuavgjald, ið ikki er goldið rættstundis.
Stk. 2. Avgjøldini eftir stk. 1 kunnu verða innheintað við afturhaldi í A-inntøkuni hjá viðkomandi sambært reglunum í skattalógini um innheinting av skatti.

§ 17. Við bót verður hann revsaður, sum við vilja ella av grovum ósketni
1) gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella heldur aftur upplýsingum til nýtslu fyri útrokning av avgjaldi eftir hesi lóg ella til avgjaldseftirlitið,

værdipapirer sælges i året. Afgiften bliver da betalt af værdien ved salg og forholdsmæssigt reduceret som i pkt. 2 fastsat. Værdien bliver opgjort som fastsat i § 8, stk. 2 og 3.
Stk. 2. Afgift på financielle aktiver i henhold til § 2, nr. 3 opkræves ikke af privatpersoners præmieobligationer, såfremt samlede årlige pålydende værdi er 2.500 kr. eller mindre.

§ 13. Afgift på finansielle aktiver og renteafgift efter denne lov kan ikke fradrages den skattepligtige indkomst.

§ 14. Toll- og Skattstovan administrerer og inddriver afgiften i henhold til denne lov. Toll- og Skattstovan får i forbindelse med administrationen af denne lov samme bemyndigelser til kontrol og andre beføjelser som foreskrevet i henhold til skattelovgivningen.

§ 15. Landsstyret kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for gennemførelsen af denne lov, og kan bl.a. fastsætte regler, som skal sikre, at der ikke kan overføres formue eller indkomst fra det tidsrum, som denne lov er gældende for.

§ 16. Afgift på finansielle aktiver og renteafgift, som ikke er betalt rettidigt, kan Føroya Gjaldstova efter begæring af Toll- og Skattstovan inddrive ved udpantning.
Stk. 2. De i stk. 1 nævnte afgifter kan inddrives ved indeholdelse i den pågældendes A-indkomst efter skattelovens regler for inddrivelse af skat.

§ 17. Med bøde straffes den, der forsætligt eller groft uagtsomt
1) afgiver urigtige eller vildledende oplysninger eller fortier oplysninger til brug for udregning af afgiften i henhold til denne lov eller for afgiftskon-

2) ikki ietur inn uppgerð so sum fyriskrivað er í §§ 7 og 8,
3) ikki avroknar avgjøld til landskassan eftir § 5, stk. 4.

Stk. 2. Tann, sum fremur eitt av nevndu brotum við tilætlan at sleppa undan at gjalda avgjøld til landskassan, verður revsaður við bót, varðhaldi ella fongsli upp í 2 ár.

Stk. 3. Fyri lógarbrot, ið framd verða av partafeløgum, lutafeløgum ella tilíkum feløgum, kann sektaráhyrgd verða áløgd felagnum sum so.

§ 18. Verður mett, at lógarbrotið ikki kemur undir strangari revsing enn sekt, kann Toll- og Skattstova Føroya boða honum, sum hetta viðvíkur, at málið kann verða loyst uttan rættarviðgerð, um so er, at hann viðgongur seg sekan í lógarbrotinum og váttar, at hann innan eina nærri ásetta freist, sum eftir áheitan kann verða longd, vil gjalda eina í fráboðanini tilskilaða sekt.

Stk. 2. Viðvíkjandi teimum í stk. 1 umrøddu fráboðanum, verða reglurnar í rættargangslógini um innihaldið í ákæruritum í politimálum samsvarandi galdandi.

Stk. 3. Verður sektarpeningurin goldin rættstunuis, ella verður bótin sambært góðkenning innheintað ella verður á annan hátt liðið revsing fyri hana, fellur málið burtur.

§ 19. Tá mál um brot á hesar reglur verða løgd fyri rættin, verða tey viðgjørd sum løgreglumál. Rættarráðini í rættargangslógini kapittul 72 og 73 kunnu nýtast í sama mun sum í málum, sum ríkisadvokaturin sambært vanligu reglunum skal fremja.

§ 20. Hendan løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur gildi frá og við 1995.

Stk. 2. Fíggjarognaravgjaldið eftir § 10 verður galdandi fyri innistandandi fevnt av

trollen,
2) undlader at indgive opgørelse efter § 7 og § 8,
3) undlader at afregne afgifter til landskassen efter § 5, stk. 4.

Stk. 2. Den, der begår en af de nævnte overtrædelser med forsæt til at unddrage landskassen afgifter, straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år.

Stk. 3. For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, andelsselskaber eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 18. Skønnes overtrædelsen ikke at ville medføre højere straf end bøde, kan Toll- og Skattstovan tilkendegive den pågældende, at sagen kan afgøres uden retslig forfølgning, såfremt denne erkender sig skyldig i overtrædelsen og erklærer sig rede til inden for en nærmere angiven frist, der efter begæring kan forlænges, at betale en i tilkendegivelsen angivet bøde.

Stk. 2. Med hensyn til den i stk. 1 nævnte tilkendegivelse finder bestemmelserne i retsplejeloven om indhold af anklageskrift i politisager tilsvarende anvendelse.

Stk. 3. Betales bøden i rette tid, eller bliver den efter vedtagelse inddrevet eller afsonet, bortfalder videre forfølgning.

§ 19. Når sager om overtrædelse af disse regler indbringes for domstolene, behandles de som politisager. Retsmidlerne i retsplejelovens kapitel 72 og 73 kan anvendes i samme omfang som i statsadvokatsager.

§ 20. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse, og har virkning fra og med 1995.

Stk. 2. Afgiften på finansielle aktiver efter § 10 har virkning for indestående omfattet

§ 2, nr. 1, ið er útrokningargrundarlag fyri rentutilskrivingar og annan ognarvinning frá og við 1. januar 1995.

Stk. 3. Rentuavgjaldið eftir § 11 verður galdandi fyri ognarvinning, fevndur av § 2, nr. 2, og sum verður innvunnin frá og við 1. januar 1995.

Stk. 4. Fíggjarognaravgjaldsskyldan eftir § 12 av virðisbrøvum, fevnd av § 2, nr. 3 er í 1995 galdandi við 0,6% í mun til virðið á virðisbrøvunum pr. 31.12.1995. Fyri seinni ár verður galdandi avgjaldsprosent í § 12 gjørt galdandi í mun til virðisbrævavirðið við ársskiftið. Viðvíkjandi keypi ella sølu í árinum smbr. § 12, pkt. 2-4.

Stk. 5. Innistandandi á konti í Føroyum, ið hevur samband við gjørdar avtalur um bygging á føroyskum skipasmiðjum í áliti til óbroyttar fortreytir, verður ikki fevnt av hesi lóg og verður framhaldandi skattað sambært prinsippinum og prosentsatsinum í reglunum í løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikassum.

Stk. 6. Rentuágóði og annar ognarvinningur av avgjaldsskyldugari ogn eftir § 2 verða fevnd av avgjaldsskylduni eftir hesi lóg, uttan mun til nær ognin verður goldin, tá ið innvinningin er tengd at avgjaldsskyldugum tíðarskeiði.

av § 2, nr. 1, som er udregningsgrundlaget for enhver rentetilskrivning og andet formueafkast fra og med 1. januar 1995.

Stk. 3. Renteafgiften efter § 11 har virkning for formueafkast, omfattet af § 2, nr. 2, og som bliver optjent fra og med 1. januar 1995.

Stk. 4. For værdipapirer omfattet af § 2, nr. 3 indtræder afgiftspligten efter § 12 med 0,6% i 1995 i forhold til værdien på værdipapirer pr. 31.12.1995. For senere år gøres afgiftsprocenten i § 12 gældende i forhold til værdipapirsværdien ved årsskiftet. Vedrørende køb og salg i året jfr. § 12, pkt. 2 - 4.

Stk. 5. Indestående på konti på Færøerne, der har forbindelse med indgåede aftaler om bygning på færøske skibsværfter, der er indgået i tillid til uændrede forudsætninger, omfattes ikke af denne lov og skal fremover beskattes i henhold til principperne og procentsatserne i lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953 om indtægtsskat af renter af indestående i færøske pengeinstitutter og sparekasser.

Stk. 6. Rentegodskrivninger og andet formueafkast af formue omfattet af § 2 er omfattet af afgiftspligten i henhold til denne lov, uanset udbetalingstidspunktet, såfremt optjeningen relaterer sig til en afgiftspligtig periode.

Viðmerkingar:

Í samband við fíggjarlógarviðgerðina fyri 1995 varð mett neyðugt at lata løgtingslógina um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald, ið bert var ætlað sum fyribilsinntøkulóg í 1993 og 1994, halda áfram, tó í broyttum líki, til tess at tryggja landskassanum neyðugu inntøkuna av hesum avgjøldum. Semja var um, at rentuskatturin varð hækkaður til 35%. Samstundis var eisini semja um, at fíggjarognaravgjaldið av innistandandi í føroyskum peningastovnum, postgiro, eftirlønarskipanum og virðisbrøvum, ið áður var 1,9% p.a., nú verður sett til 0,6% p.a. av virðinum. Rentuavgjaldið av innistandandi í útlendskum peningastovnum, í áður var 25%, verður sett til 15%.

Mett varð, at ætlaðu broytingarnar í lógini um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald fóru at geva landskassanum í inntøku 27,6 mió. kr. í 1995. Landsstýrið legði tí við løgtingsmáli nr. 33/1994 fram uppskot til broyting av løgtingslóg nr. 192 frá 10. desember 1993. M.a. innihelt uppskotið broytingar í gildisreglunum í nevndu lóg fyri at tryggja, at lógin, sum annars eftir sínum innihaldi skuldi fara úr gildi um ársskiftið 1994/1995, kundi halda áfram, men sum áður sagt í nakað broyttum líki.

Løgtingsmál nr. 33/1994 varð lagt fram av landsstýrinum í Løgtinginum tann 2. desember 1994 og eftir 1. viðgerð 5. desember 1994 beint í skattanevndina. Henda legði fram álit 21. desember 1994 við smávegis broytingum til uppskot landsstýrisins.

Skattanevndin hevði til 3. viðgerð tilevnað lógartekniskar broytingar av uppskotinum. Málið varð sett á skránna til løgtingsfundin 22. desember 1994. Broytingaruppskotið kom tó ikki sum ætlað til viðgerðar hendan dag, og fyrir hetta við sær, at landsstýrið nú má seta fram uppskot til nýggja løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald, ístaðin fyri sum ætlað at gera broytingar til áður galdandi lóg, sum jú fór úr gildi 31. desember 1994.

Í mun til áður galdandi lóg inniheldur lógaruppskot landsstýrisins einamest broytingar í avgjaldssatsunum, ið sambært framlagda uppskotinum verða 0,6% í fíggjarognaravgjaldi í mun til áður 1,9% og 15% í rentuavgjaldi í mun til tey áður galdandi 25%.

Hvat viðvíkur viðmerkingum til hettar lógaruppskot kann í høvuðsheitunum verða víst til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 19/1993, sum er uppskotið til løgtingslógina nr. 192 frá 10. desember 1993, og eisini til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 33/1994, sum var broytingaruppskot til somu lóg. (Viðmerkingarnar til nevndu løgtingsmál eins og álitið frá skattanevndini til løgtingsmál nr. 33/1994 verða hjáløgd sum fylgiskjøl).

Tað skal annars bert í stuttum verða greitt frá ætlaðu lógarbroytingunum, sum nú eru vorðnar innarbeiddar í nýggja lógaruppskotið.

Týdningarmestu munirnir á hesi lóg og higartil galdandi lóg eru, umframt longu nevndu avgjaldssatsirnar, broytingarnar í avgjaldsskylduni og hvørjar ognir avgjaldsskyldan fevnir um.

§ 2 verður broytt við tí endamáli avgjaldsliga at javnseta eftirlønaruppsparing og aðrar uppsparingar í føroyskum tryggingarfelag við tær avgjaldsreglur, sum longu hava verið í gildi fyri eftirlønaruppsparingar í føroyskum peningastovnum. Eftir hesum reglum verður fíggjarognaravgjald lagt á uppsparda virðið á eftirlønarskipanum og lívstryggingum í føroysku tryggingini.

§ 3 viðvíkur avmarkingini av, hvørjir persónar og felog koma undir avgjaldsskyldu av fíggjarognum teirra í Føroyum, og hvørji eru frítikin. Nr. 1 í greinini verður broytt, m.a. fyri at undirstrika, at sum meginregla er ein og hvør, sum hevur innistandandi í føroyskum peningastovnum, postgiro ella sum eftirlønarskipan ella lívstrygging í Føroyum, undir avgjaldsskyldu. Avgjaldsskyldan er tó tengd at, hvat skattligt tilknýti

viðkomandi kontohavari hevur til Føroya, soleiðis at avgjaldsskyldan verður avmarkað til at fevna um teir skattgjaldarar, sum eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, og eru búsitandi her. Viðmerkjast skal, at tá tað í hesum viðurskiftum verður tosað um bústað, er tað skattligi týdningurin av bústaði, so sum hesin er í mun til reglurnar í § 1, nr. 1 í skattalógini, sum er galdandi.

Í § 3 verður nú eisini í nr. 13 ásett, at føroyskir peningastovnar og tryggingarfeløg eru undantikin avgjaldsskyldu eftir hesi lóg, og verður hareftir ikki kravt avgjald av plaseringum teirra hvørki í útlandinum ella her, tað verið sig sum innskot í peningastovn ella í virðisbrøv.

§ 4 verður broytt og umorðað fyri ein part sum fylgibroyting av, at peningastovnar og trygginargarfeløg verða undantikin avgjaldsskylduni, men eisini fyri at tað skal gerast meir skilligt, at avgerandi fyri avgjaldsskylduna eftir § 4 enn er, um persónar og feløg eru fevnd av § 1 í skattalógini og hava skattligan heimstað í Føroyum samsvarandi skattatulkanini í hesum viðfangi. Tað er tí ikki avgerandi fyri avgjaldsskylduna, um viðkomandi persónur ella felag í royND og veru hevur nakra inntøku, sum eftir skattareglunum annars kemur undir skatting. Umorðingin verður mett neyðug, so tað gerst heilt greitt, at eitt nú feløg og felagsskapir, nevndir í § 1, nr. 14 í skattalógini koma undir avgjaldsskyldu eftir lógini um rentu- og tíggjarognaravgjald, um tey eiga ogn ella móttaka ognaravkast, tað kemur undir hesa lóg, og at avgjaldsskyldan tí ikki er tengd at, um tey annars hava inntøku, sum førir til skatting eftir skattalógini.

Skotið verður upp, at lógin fær gildi fyri alt 1995, bæði hvat viðvíkur innistandandi í Føroyum á postgiro, í peningastovnum og trygginarfeløgum og hvat viðvíkur ogn í útlandinum og virðisbrøvum.

1. viðgerð 6. januar 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 19. januar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 4. januar 1995 og eftir 1. viðgerð 6. januar 1995 beint í skattanevndina.

Undir viðgerðini á tingi vístu tingmenn á almennu viðmerkingarnar til tíggjarlógina, har sagt verður, at lækkar landsstýrið avgjaldið til 0,6% p.a. og frítekur peningastovnarnar fyri avgjaldsskyldu, so vilja peningastovnarnir lækka útlánsrentuna av ávísum lánum við umleið 0,75%. Skattanevndin hevur havt fund við peningastovnarnar.

Upp á fyrispurning hesum viðvíkjandi segði Føroya Sparikassi, at teir áttu ikki lut í hesum viðmerkingunum. Tá tíggjarognaravgjaldið varð sett í gildi, broytti sparikassin ikki útlánsrentuna og hevði livað við einum lítlum rentumarginali síðani. Føroya Sparikassi kann ikki geva tilsøgn um rentulækkingar í samband við umrøddu broytingar

av fíggjarognaravgjaldinum.

Føroya Banki afturímóti var vitandi um hesar viðmerkingar. Bankin førdi fram, at verður hetta uppskotið samtykt, verður rentumarginalurin lækkaður. Hetta kann í prinsippinum gerast soleiðis:

1) Innlánsrentan hækkar, og útlánsrentan verður óbroytt.
2) Innlánsrentan verður óbroytt, og útlánsrentan lækkar.
3) Útlánsrentan lækkar nakað, og innlánsrentan hækkar nakað.

Umboð fyri Føroya Banka segði, at tað bar ikki til at binda seg til eina avtalu, tí rentan í størri mun nú enn fyrr er tengd at rentuni uttanlands.

Um hetta uppskot verður samtykt, fekk nevndin eina ábending um, at pkt. 3 og lækking av prosentunum á kommunuskuldini verður tað, lækkingin av rentumarginalinum skal nýtast til. Tað skiltist á bankaleiðsluni, at meginparturin av rentulækkingini fór at koma kommununum til góðar.

Verður fyriliggjandi uppskot samtykt, verður Føroya Banki kappingarføru, segði bankaleiðslan.

Umboð fyri Tryggingina vóru eisini á fundi og greiddu frá, at í ávístum førum kappaðust tryggingin og peningastovnarnir um pensjón og trygging. Í øðrum førum ber bert til at tryggja í trygging, ikki í peningastovnum.

Umboðini fyri Tryggingina hildu, at í hesum seinra førinum átti fíggjarognaravgjald ikki at verða kravt.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirilutan og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Karl Robert Johansen, Vilhelm Johannesen og Finnbogi Ísakson) hevur hesar viðmerkingar:

Eftir uppskotinum hjá landsstýrinum skuldi lógin komið í gildi 1. januar 1995, og eitt fíggjarognaravgjald upp á 6% var tá mett at geva 27,6 mió. kr. í inntøku í ár.

Meirilutin heldur tað vera skeivt - vísandi til ta nýggju stýrisskipannarlógina - at seta eina inntøkulóg í gildi við afturvirkandi kraft.

Skotið verður tí upp at seta lógina í gildi frá 1. februar 1995, og eitt fíggjarognaravgjald upp á 0,65% gevur tá fyri árið tær somu 27,6 mió. kr.

Samstundis skjýtur sami meirilutí upp at seta týðiliga í ígildissetanargreinina, at lógin fer úr gildi 31. december 1995.

Meirilutin heldur tað ikki vera ráðiligt at gera fleiri undantøk í skipanini, soleiðis sum umboð fyri tryggingina annars mæltu til, og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

Broytingaruppskot

1) Í § 7, stk. 2, 1. punktum verður "1. januar" broytt til: "31. december".
2) Í § 8, stk. 4, verður eftir "15. februar" innsett: "í árinum eftir avgjaldstíðarskeiðinum eftir § 12".
3) § 10, stk. 1 og § 12, stk. 1, verður "0,6%" broytt til: "0,65% p.a.".
4) Í § 10, stk. 1 og stk. 2, verða "7/8" broytt til "11/13".
5) § 20, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Hendan lóg hevur gildi frá og við 1. februar 1995 til og við 31. december 1995."
6) Í § 20, stk. 2 og stk. 3 verður "1. januar 1995" broytt til: "1. februar 1995".
7) Í § 20, stk. 2 og 3 verður eftir "1. februar 1995" innsett: "og til og við 31. december 1995.".
8) Í § 20, stk. 4, verður í 1. punktum "0,6%" broytt til: "0,65% p.a.", og 2. punktum verður strikað.

1) I § 7, stk. 2, 1. punktum, ændres "1. januar" til "31. december".
2) I § 8, stk. 4 indsættes efter "15. februar": "i året efter afgiftsperioden efter § 12".
3) I § 10, stk. 1 og § 12, stk. 1, ændres "0,6%" til: "0,65% p.a.".
4) I § 10, stk. 1 og stk. 2, ændres "7/8" til: "11/13".
5) § 20, stk. 1, affattes således: "Denne lov har virkning fra og med 1. februar 1995 og til og med 31. december 1995."
6) I § 20, stk. 2 og stk. 3, ændres "1. januar 1995" til: "1. februar 1995".
7) I § 20, stk. 2 og 3 indsættes efter "1. februar 1995": "og til og med 31. december 1995.".
8) I § 20, stk. 4, ændres i "31. december 1995".
1. punktum "0,6%" til: "0,65%", og 2. punktum udgår.

Ein minniluti (Jørgen Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:

Tá fíggjarognaravgjaldið kom í gildi, var frá táverandi samgongu lovað uppspararum, at hetta var ein lóg, ið var í gildi í 1,5 ár. Nú, lógin skal fara úr gildi, ætla júst somu flokkar saman við sambandsflokkinum at lata lógin halda fram. Hetta tykist sera órímiligt.

Frá peningastovnunum eru upplýst, at innistandandi er minkað við nærum einum triðingi. Partur av hesum er clearing, men eisini er nógv flutt av landinum ella tikið út í kontantum. Fíggjarognaravgjaldið hevur gjørt, at grunnar og feløg fingu munandi størri avkast við at plasera peningin í útlandinum. Tað hevur framt nógva flyting, men eisini hava peningastovnarnir verið noyddir at borið hall fyri at varðveitt henda pening. Hetta hava peningastovnarnir gjørt, tí lógin var tíðaravmarkað og skuldi fara úr gildi 31.12.1994.

Við hesi lógini verða peningastovnar undantiknir, so ovurstóra kappingaravlagingin verður burtur viðvíkjandi føroyskum uppspararum. Peningastovnarnir kunnu nú lata nøkunlunda tað sama í rentu eftir skatting sum t.d. donsk lánsbrøv.

Men samstundis útskrivar landsstýrið lánsbrøv, har boðið verður yvir 10% í rentu. Peningastovnarnir søgdu undir nevndarviðgerðini, um landsstýrið útskrivar lánsbrøv í milliarda upphædd við høgari rentu, koma marknaðarkreftirnar náttúrliga at hækka rentustøðið í Føroyum, sum so rakar lántakarar hart, serliga sethúsaeigarar og vinnulívið. Peningur fer, har mest fæst fyri hann.

Tað er ikki sørt, at fíggjarognaravgjaldið ber brá av ognarskatti. Við fíggjarognaravgjaldinum er lagt avgjald á øll sløg av peningakonti hjá borgarunum, eisini hjá borgarum, ið skylda meira burtur, enn teir eiga. Av somu orsøk ber til at siga, at fíggjarognaravgjaldið í roynd og veru rakar harðari enn reinur ognarskattur. Hóast tú onga nettoogn eigur, tá skuldin er mótroknað, skal tú kortini gjalda skatt, sum um talan var um reella ogn.

Hevur tú t.d. eina fíggjarkonto, sum svingar millum minus og pluss, sum so gevur bæði rentuinntøku og rentuútreiðslu, skalt tú gjalda rentuskatt og fíggjarognaravgjald av rentuinntøkuni, men kanst einki gera við rentuútreiðsluna. Ein kann á somu konto hava størri rentuútreiðslur enn rentuinntøkur, men skal gjalda rentuskatt og fíggjarognaravgjald av rentuinntøkuni, t.v.s. at skattur verður tikin av sjálvari ognini og tískil eitt slag av ognarskatti.

Eisini skal uppsparda ogn fólksins í eftirlønarskipanum og lívstryggingum fíggjarognarskattast. Fólk hava trúliga sett til viks hvønn mánaða til aldurdómin aftaná, at tey hava fingið politiskt lyfti um, at tryggingarskipanirnar ikki fóru at verða rørdar, men hvat?

Undanførslan við hesum uppskoti er tann sama sum við so nógvum øðrum inntøkulógum, nevniliga at fáa meira pening til fíggjarlógina. Sitandi samgonga ger sama feil sum undanfarna samgonga, nevndiliga starir seg blindan í meirinntøkum og gloymir sparingar. Fíggjarlógaruppskotið fyri 1995 vísir, at rakstrarútreiðslurnar verða hægri enn fyri 1994, meðan fløgur og viðlíkahald minka nakað, tó ikki nær námind av hækkingini av rakstrinum.

Sum krúnan oman á verkið hevur meirilutin í skattanevndini skotið upp at hækka fíggjarognaravgjaldið úr 0,6% til 0,65%. So hvørt skattir og avgjøld eru hækkað, er samfelagið vorðið meir og meir avskeplað, og tí má henda gongd steðgast, og javnvág má fáast millum tann vinnuliga og almenna sektorin í samfelagnum.

Minnilutin mælir frá at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 24. januar 1995. Broytingaruppskotið samtykt við 20-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt samtykt við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð 27. januar 1995. Málið endaliga samtykt við 18-0 atkvøðum.

Lóg nr. 15 frá 1. februar 1995.

68 Lán til Húsalánsgrunnin

Ár 1995, mikudagin 4. januar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um lán til Húsalánsgrunnin.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1995 at veita Húsalánsgrunninum upp til 50 mió. kr. í láni.

§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om lån til Boliglånefonden.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1995 at bevilge Boliglånefonden lån på op til 50 mio. kr.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur á fíggjarlógini sett 50 mió. kr. av til lán til Húsalánsgrunnin. Grunnurin skal gjalda munandi aftur av skuld sínt í 1995, og fyri at tryggja, at grunnurin kann svara afturgjaldsskyldur sínar, heldur landsstýrið tað vera neyðugt at veita grunninum lán uppá upptil 50 mió. kr. í 1995.

Landsstýrið greiddi í viðmerkingunum til fíggjarlógina frá, at grunnurin nú hevur eina eginogn uppá 112 mió. kr. Landsstýrið heldur tað tí ikki vera neyðugt at veita grunninum nakað ískoyti til eginognina í 1995.

Landsstýrið er, síðan fíggjarlógin er samtykt, komið eftir, at ógreitt er, um játtanin undir "nýútlánum" á fíggjarlógini er nóg góð heimild í sær sjálvum. Fyri eingin ivi skal vera um heimildina, skal landsstýrið við hesum søkja løgtingið um heimild at veita Húsalánsgrunninum lán uppá upp til 50 mió. kr. í 1995.

1. viðgerð 16. januar 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 24. januar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 4. januar 1995 og eftir 1. viðgerð tann 18. januar 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini havt fund við Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í fíggjarmálum. Nevndin mælir til, at landsstýrið fær heimild til at áseta nærri reglur fyri afturgjalding av láninum. Við hesi broyting mælir **ein samd nevnd** løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir tí fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1. verður sum nýtt stk. 2. sett:
"**Stk. 2.** Landsstýrið fær heimild til at áseta nærri reglur fyri afturgjalding av láninum."

I § 1. sættes som nyt stk. 2.:
"**Stk. 2.** Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere regler for tilbagebetaling af lånet."

2. viðgerð 27. januar 1995. Broytingaruppskot nevndarinnar samtykt við 24-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 31. januar 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

Lóg nr. 28 frá 14. februar 1995.

69 Broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti

Ár 1995, friggjadagin 27. januar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlingaviðurskifti við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Tilskilað skal verða í lærusáttmálanum, undir hvørjum lønartreytum lærlingur skal arbeiða í lærutíðini. Lærlingalønin verður ásett av yrkisfeløgunum ella víðkaða læruráðnum, um so er, at yrkisfeløgini ikki hava ásett lønirnar. Landskassin endurrindar læruplássunum 75% av lærlingalønini, meðan lærlingur fær ta til læruna hoyrandi skúlagongd. Fyri handils- og skrivstovulærlingar, hernndir lærlingar levndir av løgtingslóg nr. 49 frá 5. mars 1987 um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið, verður endurgjald tó einans veitt í samband við kravd sergreinaskeið."

2) Í § 11, stk. 1 verður aftaná "lærlingar á sama lærustigi." sum nýtt punktum sett: "Læruráðnum verður heimilað í serligum førum at loyva frávik frá regluni um, at undirvísingin skal verða givin sær fyri lærlingar á sama lærustigi."

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om lærlingeforhold.

§ 1.

I lagtingslov nr. 29 af 12. oktober 1954 om lærlingeforhold med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 4, stk. 1 affattes således:
"Det skal indføres i lærekontrakten, på hvilke lønvilkår lærlingen skal arbejde i læretiden. Lærlingelønnen fastsættes af arbejdsmarkedets parter eller af det udvidede læreråd, såfremt arbejdsmarkedets parter ikke har fastsat lønningerne. Landskassen refunderer lærestederne 75% af den fastsatte lærlingeløn, medens lærlinge deltager i den til uddannelsen hørende undervisning. For handels- og kontorlærlinge, herunder lærlinge omfattet af lagtingslov nr. 49 af 5. maj 1987 om grunduddannelse indenfor administrations-, handels- og kontoroområdet, ydes dog kun refusion i forbindelse med obligatoriske branchekurser."

2) I § 11, stk. 1 indsættes efter "lærlinge på samme uddannelsestrin." som nyt punktum: "Lærerådet bemyndiges til i særlige tilfælde at tillade afvigelser fra regelen om, at undervisningen skal gives særskilt for lærlinge på samme uddannelsestrin."

§ 2.

Denne lov får virkning fra den 1. januar

Stk. 2. Broyting nr. 1 fevnir um lærusáttmálar, sum eru góðkendir aftaná 16. juni 1993.

1995.

Stk. 2. Ændring nr. 1 omfatter lærekontrakter, der er godkendt efter 16. juni 1993.

Viðmerkingar:

Aftaná at steðgur mest sum var komin í lærlingatilgongdina í 1979, samtykti løgtingið við løgtingslóg nr. 88 frá 18. september 1980 at seta í gildi ta skipan, at landskassin skuldi endurrinda læruplássum 50% av lærlingalønini undir skúlagongd. Hetta varð gjørt fyri at stuðla læruplássum í at taka ungfólk í verkliga útbúgving, og samstundis nøkta tørvin hjá handverksvinnuni á fólki við yrkisførleika.

Henda skipan virkaði í útvið 13 ár, men varð so vegna fíggjarligar skerjingar tikin av við løgtingslóg nr. 122 frá 21. mai 1993. Nýggir lærusáttmálar, ið vórðu gjørdir aftaná, at lógin var lýst 16. juni 1993, hava sostatt ikki fingið 50% endurgjald.

Úrslitið av hesum vísti seg skjótt sum ein munandi afturgongd í lærlingatalinum. Samlaða lærlingatilgongdin í 1993 var einans 66 í mun til 120 í 1992, 130 í 1991 og 147 í 1990.

Í álitinum hjá fíggjarnevndini til løgtingsfíggjarlógina 1995 (løgtingsmál nr. 30/1994) stendur á bls. 17:

> "Meirilutin ásannar, at tað hevur verið ein stór afturgongd í møguleikuhum hjá ungum fólki at koma í handverkslæru. Fyri at bøta um hesi viðurskifti heldur meirilutin, at tað er neyðugt at fremja ítøk, sum gera tað lættari hjá handverksmeistarum at taka fólk í læru. Meirilutin heldur, at gamla lógin, sum veitti handverksmeistarum endurgjald av lønini hjá lærlingum, meðan teir ganga í skúla við 50%, eigur at verða sett í gildi aftur, tó soleiðis, at endurgjaldið verður 75%, og at stuðulin eisini fevnir um lærlingar, ið ganga á Føroya Handilsskúla. Út frá hesum skjýtur meirilutin upp, at játtanin til Føroya Læruráð verður hækkað við 1,1 mó. kr., sum skipanin verður mett at kosta."

Viðmerking er komin á løgtingsins fíggjarlóg fyri 1995 um at gera lógarbroyting um hetta.

Í sambandi við lága talið á lærlingum skjýtur landsstýrið upp at broyta § 11, stk. 1 soleiðis, at læruráðnum í serligum førum verður heimilað at loyva frávik frá regluni um, at undirvísingin av lærlingum skal verða givin sær fyri lærlingar á sama lærustigi. Landsstýrið metir tað vera óheppið ikki at kunna undirvísa lærlingum á ymiskum lærustigum saman, har tað eftir læruráðsins meting ber til og er forsvarligt. Á tann hátt ber til at fáa størri floksbýtingartal og sleppa undan undirvísing í smáum flokkum.

Serligar viðmerkingar:

ad 1: Skotið verður upp at broyta § 4, stk. 1 soleiðis, at skipanin við lønarendurgjaldi til lærumeistarar, tá lærlingur fer í tekniskan skúla, verður innført aftur, tó soleiðis at læruplássið fær endurgjaldið. Skotið verður somuleiðis upp at víðka skipanina soleiðis, at hon fevnir um øll læruplkáss hjá lærlingum, sum eru fevndir av lærlinga- ella FHS-

lógini.

ad 2: Sambært uppskotinum verður heimilað Læruráðnum í serligum førum at loyva frávik frá regluni um, at undirvísingin skal verða givin sær fyri lærlingar á sama lærustigi.

ad § 2: Lógin fær sambært uppskotinum gildi frá 1. januar 1995 og fevnir § 4, stk. 1 um lønarútreiðslur frá hesum degi at rokna. T.v.s. at einki lønarendurgjald verður latið fyri tíðina undan 1. januar 1995. Lærusáttmálar, sum eru góðkendir aftaná 16. juni 1993, eru fevndir av § 4, stk. 1.

Samsvarandi hesum mælir landsstýrið løgtinginum til at samtykkja frammanfyri standandi lógarbroyting.

1. viðgerð 2. februar 1995. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 10. mars 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. januar 1995 og eftir 1. viðgerð 2. februar 1995 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur á fundi 20. februar 1995 viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við tí og mælir løgtinginum til at samtykkja tað fyri árið 1995.

Nevndin er av teirri áskoðan, at endurgjaldið til meistaran eigur at vera 100%, meðan lærlingurin gongur í skúla, og at hann ikki er arbeiðstøkur í hesum tíðarskeiði.

Sostatt setir **ein samd nevnd** fram soljóðandi

U p p s k o t

t i l
samtyktar

Løgtingið samtykkir at heita á landsstýrið um at leggja fyri tingið uppskot um at broyta løgtingslóg um lærlingaviðurskifti soleiðis, at endurgjaldið til meistara verður 100% frá 1. januar 1996, og at lærlingur ikki verður arbeiðstøkur í skúlatíðini.

2. viðgerð 16. mars 1995. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 28-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 18. apríl 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

Lóg nr. 49 frá 2. mai 1995.

70 Broyting í løgtingslóg um bjálvingarstuðulslán til pensjónistar

Ár 1995, mánadagin 16. januar legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bjálvingarstuðulslán til pensjónistar.</u>

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 40 frá 7. mai 1991 um bjálvingarstuðulslán til pensjónistar verður gjørd henda broyting:
Í § 7 verður "kr. 45.000,-" broytt til: "kr. 80.000,-".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

<u>lagtingslov om ændring i lagtingslov om isoleringstilskudslån til pensionister.</u>

§ 1.

I lagtingslov nr. 40 af 7. maj 1991 om isoleringstilskudslån til pensionister foretages følgende ændring:
I § 7 ændres "kr. 45.000,-" til: "kr. 80.000,-".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg um bjálvingarstuðulslánsgrunnin er ásett, at í mesta lagi kr. 45.000,- verða læntar. Henda lóg er frá 1991, t.v.s. áðrenn meirvirðisgjald var sett í gildi, og tí er ikki tikin hædd fyri útreiðslunum fyri MVG.

Harumframt kemur í nógvum førum fyri, at henda upphædd ikki er nóg mikið til

arbeiðið. Í tílíkum førum hevur Húsalánsgrunnurin veitt lán upp til kr. 20.000,- til vanliga rentu hjá Húsalánsgrunninum við 15 ára afturgjaldstíð. Hesin møguleiki var ikki meira til staðar, tá Húsalánsgrunnurin gavst við útgjaldingum.

Landsstýrið vil tí við hesi broyting hækka bjálvingarstuðulslánið úr kr. 45.000,- í kr. 65.000,- + 25% MVG, ella rundað til kr. 80.000,-.

Annars hevur grunnurin higartil útgoldið 708 lán við tilsamans kr. 26.890.000,-.

Í 1994 fram til 22. november eru útgoldin 81 nýggj lán uppá tilsamans kr. 3.120.000,-.

Grunnurin hevur í løtuni í tøkum peningi kr. 9.100.000,-.

1. viðgerð 19. januar 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 24. januar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. januar 1995 og eftir 1. viðgerð tann 19. januar 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og **ein samd nevnd** tekur undir við tí og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 27. januar 1995. Uppskotið samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 31. januar 1995. Málið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 29 frá 14. februar 1995.

FL jnr. 2309-1/91.

RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22


6



RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22

LØGTINGS-
TIDINDI

1994

71 Løgtingslóg um bygningarnar hjá Royndarstøðini í Kollafirði.

Uppskot

til

Løgtingslóg um bygningarnar hjá Royndarstøðini í Kollafirði.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at lata Búnaðardeplin reka bygningarnar hjá Royndarstøðini í Kollafirði. Landsstýrið ásetir treytirnar.

§ 2. Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Løgtingslov om bygningerne tilhørende Forsøgsstationen i Kollafirði.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til at overdrage driften af bygningerne tilhørende Forsøgsstationen i Kollafirði til Landbrugscentret. Landsstyret fastsætter betingelserne.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur á fundi samtykt at umskipa Royndarstøðina í Kollafirði. Meginreglan í hesi umskipan er, at Royndarstøðin í núverandi líki verður niðurlagd og umskipað til almennar royndir innan landbúnað. Royndarstøðin sjálv, bygningar og hentleikar, verða latin Búnaðardeplinum, sum miðsavnar høvuðstænastur, almennar og privatar, innan landbúnaðin. Landsstýrið metir, at henda umskipan, sum hevur fullan stuðul frá vinnuni, er eitt tíðandi íkast til at skapa grundarlag fyri nýggjari menning innan landbúnaðin.

Hetta verður gjørt soleiðis, at almennar tænastur, so sum royndarstjóri/landbúnaðarráðgevi, djóralæknatænasta, útbúgving og búskaparlig ráðgeving kunnu húsast saman við felagsskapum hjá bøndrum, umsitingini hjá Mjólkarvirkið Búnaðarmanna, Búrøkt o.ø. fyri at nýta teir hentleikar, sum eru á Royndarstøðini, og fyri at spara pening.

Til at umsita ognirnar hevur landsstýrið sett eina húsanevnd við einum umboði fyri Mjólkarvirkið, einum fyri Bóndafelagið og einum fyri almennar royndir og einum fyri landsstýrið.

Teir stovnar og feløg, sum hava leigað seg inn í húsini, gjalda húsaleigu eftir takstum, sum landsstýrið hevur góðkent. Ætlanin er, at tann peningurin, sum kemur inn fyri húsaleigu, skal koma deplinum til góðar, soleiðis at hann verður brúktur til viðlíkahald og útbygging og annars til at uppfylla endamálið við Búnaðardeplinum.

Búnaðardepulin skal hvørki geva landskassanum inntøkur ella útreiðslur. Landsstýrið

letur landbúnaðinum bygningarnar í Kollafirði í varðveitslu við teirri treyt, at landbúnaðurin heldur bygningarnir viðlíka, og at hetta ikki fer at kosta landskassanum nakað.

1. viðgerð 24. januar 1995. Málið varð beint í landbúnaðarnevndina, sum 23. februar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. januar 1995 og eftir 1. viðgerð tann 24. januar 1995 beint í landbúnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við umboð fyri:

Føroya Bóndafelag
Óðalsfelagið
Traðarmannafelagið
Jarðarráðið
Royndarstøðina og
Mjólkarvirkið Búnaðarmanna.

Samanumtíkið tóku allir undir við málinum.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 8. mars 1995. Uppskotið samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 16. mars 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lóg nr. 46 frá 20. apríl 1995.

FL jnr. 1750-8/91.

72 Norðurlendskur sáttmáli um sínámillum rættarhjálp

Ár 1995, mánaðagin 16. januar legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at norðurlendskur sáttmáli frá 26. apríl 1974 um sínámillum rættarhjálp verður settur í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:

Sorinskrivari heitti við skrivi dagfest 17. oktober 1994 á ríkismyndugleikarnar um at fáa sáttmálan um sínámillum rættarhjálp kunngjørdan og settan í gildi í Føroyum, tí annars hava føroyskir rættarmyndugleikar ikki sambært sáttmála heimild til at biðja aðrar norðurlendskar rættarmyndugleikar um hjálp í samband við prøvupptøku og líknandi.

Sáttmálin áleggur teimum norðurlendsku londunum at hjálpa hvørjum øðrum í samband við kunngerð, prøvupptøku og líknandi, og sum høvuðsregla skulu útreiðslurnar rindast av tí ríkinum, ið er biðið um hjálp.

Hjálagt er skriv sorinskrivarans dagfest 17. oktober 1994, skriv uttanríkismálaráðsins dagfest 13. desember 1994, skriv ríkisumboðsmansins dagfest 19. desember 1994 og norðurlendski sáttmálin frá 26. apríl 1974.

1. viðgerð 27. januar 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 17. februar 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. januar 1995, og varð aftaná fyrstu viðgerð tann 27. januar 1995 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið, og tekur **einmælt** undir við at seta sáttmálan í gildi í Føroyum.

2. viðgerð 8. mars 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

FL jnr. 500-7/94.

73 Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi

Ár 1995, mánadagin 16. januar legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi.

Kapittul 1
Virking av vørum úr 3. lands fiski.

§ 1. Heimilað verður landsstýrinum í fíggjarárinum 1995 at veita fiskavirkjum stuðul til keyp av 3. lands fiski, krabbadýrum og skeljadýrum til virkingar í Føroyum.
Stk. 2. Stuðul kann játtast eftir umsókn, har allar týðandi upplýsingar um rávørukeypið og ætlaðn framleiðsluna eru hjálagdar. Játtast kann í mesta lagi 1,25 kr. fyri hvørt kg av fiski, krabbadýrum og skeljadýrum, innflutt verður.
Stk. 3. Stuðulin kann útgjaldast sambært skjalprógvum fyri innflutningi og útflutningi.

Kapittul 2
Stuðul til vørumenning o.a.

§ 2. Heimilað verður landsstýrinum í fíggjarárinum 1995 at veita stuðul til vørumenning o.a. á føroyskum fiskavirkjum.
Stk. 2. Stuðul kann játtast til verkætlanir, ið miða móti menning av framleiðsluni, vørumenning og sølumenning.

lagtingslov om støtte til udvikling af fiskerierhvervet på land.

Kapitel 1
Produktion af varer af 3. lands fisk

§ 1. Landstyret bemyndiges til i finansåret 1995 at yde fiskerivirksomheder støtte til indkøb af 3. lands fisk, krebsdyr og skaldyr til bearbejdelse på Færøerne.
Stk. 2. Støtten kan ydes efter ansøgning, hvor alle relevante oplysninger om råvarekøbet og den påtænkte produktion er vedlagt. Der kan højst bevilges 1,25 kr. for hvert kg fisk, krebsdyr og skaldyr, der importeres.
Stk. 3. Støtten kan udbetales i henhold til dokumentation for import og eksport.

Kapitel 2
Støtte til produktudvikling m.m.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til i finansåret 1995 at yde støtte til produktudvikling m.m. på færøske fiskerivirksomheder.
Stk. 2. Støtten kan bevilges til projekter, hvis formål er at udvikle produktionen, produktudvikling og salgsudvikling.

§ 3. Treytin fyri stuðuli er:
a) at løgd verður fram útgreind frágreiðing um verkætlanina, tíðarætlan og meting um kostnað og inntøkur og
b) at verkætlanin kann menna fiskavirkingina á landi yvirhøvur og gevur virðisøking til samfelagið.

§ 4. Landsstýrið kann játta í stuðuli upp til 1/3 av kostnaðinum fyri verkætlanina.

Kapittul 3
Felagsreglur

§ 5. Stuðul eftir hesi lóg verður at taka av játtanini á rakstrarstaði 18584: "Stuðul til menning av fiskivinnu á landi" í fíggjarlógini fyri 1995.

§ 6. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur fyri veitan av stuðuli sambært hesi lóg, herundir at áseta eitt býti av játtanini millum stuðul eftir kapittul 1 og stuðul eftir kapittul 2.

§ 7. Henda lóg fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd, tó hevur § 1 gildi frá 1. januar 1995.

§ 3. Betingelsen for støtte er:
a) at der fremlægges en redegørelse over projektet, tidsplan og vurdering af omkostninger og indtægter og
b) at projektet overhovedet kan udvikle fiskeritilvirkningen på land og skaber værdiforøgelse for samfundet.

§ 4. Landsstyret kan bevilge op til 1/3 af projektets omkostninger.

Kapitel 3
Fællesregler

§ 5. Støtte efter denne lov bevilges af driftskonto 18584: "Støtte til udvikling af fiskerierhvervet på land" i finansloven for 1995.

§ 6. Landsstyret kann i bekendtgørelse fastsætte nærmere bestemmelser om bevilgning af støtte efter denne lov, herunder fastsætte en fordeling i bevillingern mellem støtte i.h.t. kapitel 1 og kapitel 2.

§ 7. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort, dog har § 1 gyldighed fra 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1995 eru á rakstrarstaði 18584 - stuðul til menning av fiskivinnu á landi - avsettar 20 mió. kr. Henda upphædd kemur í staðin fyri ta upphædd, sum í fíggjarárinum 1994 varð sett av til "Javning móti tollverju".

Landsstýrið roknar við, at av játtanini í fíggjarárinum 1994 verða uml. 2 mió. kr. nýttar; knappar 10 mió. kr. til stuðul sambært kapitli 1 og góðar 2 mió. kr. til stuðul sambært kapitli 2.

At meira ikki er nýtt av játtanini í 1994 kemst eftir tí landsstýrið hevur skilt m.a. av at trupult hevur verið hjá fiskavirkjum at fáa fígging til keyp av triðjalandsfiski í

teimum mánaðum, tá prísirnir vóru rímiliga lágir, og nøgdin stór, og
at prísirnir á triðjalandsfiski og -rækjum hava verið rættiliga høgir í heyst.

Ein orsøkin kann eisini vera, at ein ávís óvissa lá í, at lógargrundarlagið ikki var komið uppá pláss fyrr enn í mai mánaði. Tí var ásett, at lógin fekk gildi frá 1. januar 1994 fyri stuðul sambært § 1. Landsstýrið er vitandi um, at fiskavirkir fyrireika keyp av triðjalandsfiski fyrst í 1995, og tí er henda áseting eisini komin við í hetta lógaruppskot.

Gongd tykist annars at vera komin í virking av vørum úr triðjalandsfiski og í at finna marknað fyri hesum vørum. Eftir landsstýrisins fatan eru umstøðurnar á keyps- og sølumarknaðinum enn so ótryggar, at tíðin ikki er komin til at sleppa stuðli sambært 1. kapitli í lógini, soleiðis sum annars átti at verið náttúrligt. Landsstýrið fegnast tó um, at umsóknir um stuðul sambært 2. kapitli gerast fleiri. Henda gongd er eisini í samsvari við landsstýrisins vinnupolitikk at fáa gongd aftur í menning av framleiðsluni, vørumenning og sølumenning. Fyri í størri mun at tryggja hesa gongd, skjýtur landsstýrið upp, at lógin verður broytt soleiðis, at landsstýrið í kunngerðini sambært § 6 kann áseta býti av játtanini millum stuðul sambært 1. kapitli og 2. kapitli. Landsstýrið hugsar sær, at í hvussu so er 2/5 av játtanini verða tryggjaðir til stuðul til vørumenning o.a. sambært 2. kapitli.

Landsstýrið arbeiðir annars við einari samskipan av teimum stuðulsskipanum, sum í dag eru, til tess at menna kappingarførið hjá føroyskum fyritøkum. Arbeiðið er enn ikki komið nóg langt áleiðis til, at ein samskipað ætlan kann verða samtykt og sett í verk. Landsstýrið heldur tað vera neyðugt at fyrireika komandi skipan so vel, at ikki skal verða neyðugt í bræði at gera broytingar aftur. Sum fyrsta stig hevur ein arbeiðsbólkur gjørt álit um arbeiðsskapandi politikk, og herumframt hevur landsstýrið sett annan bólk til at koma við uppskoti um broytta reglugerð fyri grunnin til ídnaðartremjandi endamál. Burtur úr tilmælunum frá hesum arbeiðsbólknum og øðrum fer landsstýrið at gera sína niðurstøði, har dentur fer at verða lagdur á at fáa stuðulsskipanir, ið eru smidligar, skjótar og virka saman, so stuðulsverdar verkætlanir hjá føroyskum framleiðslu- og tænastufyritøkum kunnu verða skjótt viðgjørdar og avgreiddar. Landsstýrið fer herumframt at leggja dent á, at fyritøkurnar kunnu kenna seg vissaðar um, at verkætlanir, sum stuðul verður veittur til, verða viðgjørdar og avgreiddar sum tað loyndarmál, verkætlanin í royndi og veru er fyri fyritøkuna.

1. viðgerð 24. januar 1995. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 9. mars 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. januar 1995 og eftir 1. viðgerð tann 24. januar 1995 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og er nevndin av teirri áskoðan, at ein menning av fiskivinnuni á landi má ikki skerja verandi arbeiðspláss og mælir tí til, at skoytt verður

uppí grein 3 b) "uttan at skerja verandi arbeiðspláss". Eisini heldur nevndin, at ein treyt fyri at fáa stuðul til vørumenning er, at umsøkjarin skal leggja fram váttan fyri tryggari fíggjarstøðu síni. Við hesum broytingum mælir **ein samd nevnd** løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 3. b) verður skoytt uppí:
"uttan at skerja verandi arbeiðpláss."

2) Sum nýtt § 3 c) verður sett:
"c) at umsøkjarin
leggur fram váttan fyri tryggari fíggjarstøðu síni."

1) I § 3. b) tilføjes:
"uden at eksisterende arbejdsplaser begrænses."

2) Som nyt § 3 c) sættes:
"c) at ansøgeren dokumenterer holdbare økonomiske forhold."

2. viðgerð 16. mars 1995. Broytingaruppskotið samtykt við 28-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins soleiðis broytt samtykt við 29-0 atkvøðum.

3. viðgerð 18. apríl 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

Lóg nr. 48 frá 2. mai 1995.

FL jnr. 1525-11/94.

74 Broyting í løgtingslóg um val til Føroya løgting

Ár 1995, mánadagin 16. januar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Føroya løgting.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Føroya løgting, sum broytt við løgtingslóg nr. 42 frá 5. mai 1987 og løgtingslóg nr. 68 frá 13. mai 1992 verða hesar broytingar gjørdar:

1) § 12 verður orðað soleiðis:
"**§ 12.** Landsstýrið velur fyri 4 ár eina valnevnd fyri hvørt valdømi við 3 limum og 1 tiltakslimi fyri hvønn av limunum. Formansstarvið í nevndini verður eftir raðfylgjuni, limirnir eru valdir í. Limirnir hava skyldu at taka við starvinum uttan so, at teir hava fylt 60 ár ella eftir landsstýrisins meting hava lógligt forfall."

2) § 44, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Klagur um løgtingsval skulu vera løgtingsskrivstovuni í hendi innan kl. 10.00 tíggjunda yrkadag eftir valdagin."

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om valg til Færøernes lagting.

§ 1.

I lagtingslov nr. 49 af 20. juli 1978 om valg til Færøernes lagting, som ændret ved lagtingslov nr. 42 af 5. maj 1987 og nr. 68 af 13. maj 1992 foretages følgende ændringer:

1) § 12 affattes således:
"**§ 12.** Landsstyret vælger for hver opstillingskreds for 4 år ad gangen et valgnævn med 3 medlemmer og 1 suppleant for hver af medlemmerne. Valgnævnets formandspost indtages af medlemmerne i den orden, hvori de er valgt. Ethvert medlem af valgnævnet er pligtigt til at påtage sig hvervet, medmindre vedkommende er fyldt 60 år, eller efter landsstyrets skøn har lovligt forfald.

2) § 44, stk. 1 affattes således:
"Klager over lagtingsvalg skal være kommet frem til lagtingskontoret inden kl. 10.00 tiende søgnedag efter valgdagen."

§ 2.

Denne lov træder i kraft olaidag 1995.

Viðmerkingar:

Broyting nr. 1 er gjørd vísandi til § 35, stk. 2 í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994

um stýrisskipan Føroya, har tað stendur, at løgtingið ikki kann velja limir í nevndir, stýri ella ráð, ið hava heimild at taka endaligar fyrisitingarligar avgerðir, og til løgtingssamtykt um, at uppskot til løgtingslógir, sum taka fyrisitingarligu heimildirnar frá løgtingsnevndum og leggja tær til landsstýrið, skulu verða løgd fyri løgtingið innan 1. januar 1995.

Broyting nr. 2 er ein fylgja av, at freistin fyri at kæra um løgtingsval ikki kann verða seinni enn tann dagin valið verður góðkent, t.v.s. sambært § 9 í stýrisskipanarlógini kl. 10.00 tólvta yrkadag eftir valdagin.

Endaliga uppgerðin (fínteljingin) av valinum verður gjørd av løgtingsvalnevndunum seinast vikudagin aftaná valið. Hóskandi er tí at seta kærufreistina til tíggjunda dagin aftaná valdagin, so møguligar kærur kunnu kannast, áðrenn løgtingið skal góðkenna valbrøvini í seinasta lagi tólvta dagin aftaná valið.

Eftir stýrisskipanarlógini kann løgtingið koma saman áðrenn tólvta dagin eftir valið, men mett verður, at løgtingið ikki kann góðkenna valið fyrr enn kærufreistin er úti - eftir uppskotinum tíggjunda dagin aftaná valið.

1. viðgerð 19. januar 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 17. februar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. januar 1995 og varð aftaná fyrstu viðgerð tann 19. januar 1995 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur sum heild undir við uppskotinum. Tó heldur nevndin ikki, at formansstarvið í nevndunum skal verða eftir raðfylgjuni, liminir eru valdir í; men at valnevndirnar skulu skipa seg sjálvar. **Nevndin** setir tí fram soljóðandi :

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) § 12 verður orðað soleiðis:
"**§ 12.** Landsstýrið velur fyri 4 ár eina valnevnd fyri hvørt valdømi við 3 limum og 1 tiltakslimi fyri hvønn av limunum. Nevndin skipar seg sjálv. Limirnir hava

1) § 12 affattes således:
"**§ 12.** Landsstyret vælger for hver opstillingskreds for 4. år ad gangen et valgnævn med 3 medlemmer og 1 suppleant for hver af medlemmerne. Valgnævnet

skyldu at taka við starvinum uttan so, at teir hava fylt 60 ár ella eftir landsstýrisins meting hava lógligt forfall."

vælger selv sin formand. Ethvert medlem af valgnævnet er pligtigt til at påtage sig hvervet, medmindre vedkommende er fyldt 60 år, eller efter landsstyrets skøn har lovligt forfald."

2. viðgerð 23. februar 1995. Broytingaruppskot nevndarinnar samtykt við 28-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins soleiðis broytt samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 9. mars 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

Lóg nr. 41 frá 14. mars 1995.

FL jnr. 700-1/91.

75 Broyting í fiskivinnuídnaðarmynstrinum

IKKI FRAMLAGT

76 Skipan um loyvi at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/-Baltisku londunum eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi

Ár 1995, fríggjadagin 27. januar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Vísandi til fiskivinnuavtalurnar við Russland og Baltisku londini góðkennir løgtingið niðanfyri nevndu skipan.

Skipanin ber í sær, at loyvt skal verða at binda upp til 40.000 tons av svartkjafti sum eyka kvotur í føroyskum sjógvi upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/Baltisku londunum. Til hesa eyka kvotu kunnu 8 skip afturat fáa fiskiloyvi undir Føroyum. Landsstýrið skal góðkenna samstarvsavtalurnar við tí fyri eyga, at støðið undir almennu avtalunum við Russland og Baltisku londini viðvíkjandi býti av fiski ikki verður tikið undan.

Viðmerkingar.
Í fiskivinnusáttmálunum við Russland og Baltisku londini er ásett, at partarnir skulu virka fyri samstarvi millum vinnufyritøkur í Føroyum og Russlandi/Baltisku londunum.

Víst verður til grein VIII í váttaðu frásøgnini frá 18. fundi í føroysku-russisku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál, undirritað í Moskva 25. november 1994. Víst verður somuleiðis til fundarsemjurnar frá samráðingunum við Estland, Lettland og Litavia í Keypmannahavn 25., 26. og 27. oktober 1994.

Í sambandi við hetta er ynski um, at skip úr hesum londum kunnu fáa eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum fiskiøki, og at loyvt verður at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/Baltisku londunum eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi.

1. viðgerð 31. januar 1995. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 2. februar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. januar 1995 og eftir 1. viðgerð 31. januar 1995 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Ivan Johannesen, landsstýrismann í fiskivinnumálum. Landsstýrismaðurin greiddi frá, at henda skipan at binda svartkjaftakvotu upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/Baltisku londunum hevur verið reynd fyrr, og er hesin táttur tikin uppaftur í fiskivinnusáttmálanum millum Føroyar og Russland og millum Føroyar og Baltisku londini fyri 1995.

Landsstýrismaðurin greiddi frá, at nevndu 40.000 tons av svartkjafti, sum landsstýrið eftir uppskotinum fær heimild at ráða yvir, eru partur av heildarkvotuni, sum er avtalað við Russland og Baltisku londini. Talan er sostatt ikki um eina eyka kvotu umframt tær avtalur um fiskirættindi, sum eru gjørdar millum londini. Marknaðarnevndin ger vart við, at uppskotið til samtyktar og viðmerkingar landsstýrisins kunnu misskiljast, og eigur hetta ikki at vera so.

Tað verður sagt, at 8 skip kunnu fáa fiskiloyvi undir Føroyum til hesa kvotu, ásett er ikki, hvussu nógv verður í part til Russland og til Baltisku londini. Marknaðarnevndin metir, at serstøk avtala átti at verið gjørd við ávikavist Russland og við tey Baltisku londini og heitir á landsstýrið at hava tað í huganum til komandi samráðingar.

Við hesum viðmerkingum tekur **ein samd nevnd** undir við uppskoti landsstýrisins til samtyktar og heitir á løgtingið at taka undir við málinum.

2. viðgerð 14. februar 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

77 Skipan millum Føroyar og Baltisku londini um sínámillum fiskirættindi í 1995

Ár 1995, fríggjadagin 27. januar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir hjáløgdu avtalur frá 25., 26. og 27. oktober 1994 millum Føroyar og Baltisku londini um sínámillum fiskirættindi í 1995.

Viðmerkingar:

25., 26. og 27. oktober 1994 vóru fiskivinnusamráðingar í Keypmannahavn við ávikavist Estland, Lettland og Litavia. Fundarsemjurnar frá samráðingunum eru hjálagdar.

Altjóða fiskiveiðinevndin fyri Eystursjógvin hevur ásett TAC'ið fyri tosk til 100.000 t í 1995. Hetta er ein øking við 2/3 í mun til eitt TAC uppá 60.000 t í 1994. Samstundis er bann fyri toskaveiði ásett frá 1. juni til 31. august 1995.

Estland hevði fiskað svartkjaftakvotuna fyri 1994 upp og ynskti tí størri kvotu fyri 1995, 10.000 tons. Afturfyri fingu Føroyar eina øking í kvotuni fyri tosk, laks, sild og brisling í estiskum sjógvi. Tað var serliga ringt at fáa eina øking í toskakvotuni, og tey tillutaðu 300 tonsini fyri 1995 eru 17% av samlaðu estisku toskakvotuni.

Lettland ynskti at seta støðið á sáttmálanum niður í helvt, av tí at fá skip hava áhuga í svartkjaftakvotuni. Fiskiskapurin er ikki lønandi, og marknaðarbúskapurin hevur broytt alla lettisku fiskivinnuna. Føroyar fingu minni enn helvtina í toskakvotu, 300 t samanborið við 700 t fyri 1994, og í staðin var farið upp í sild og brislingi.

Litavia hevði als ikki nýtt kvotuna í 1994, men ynskti hóast tað at varðveita somu kvotu fyri 1995. Av tí at TAC'ið fyri tosk er økt, varð úrslitið, at føroyska toskakvotan øktist við 100 t til 300 t, og silda- og brislingakvoturnar vórðu tiknar burtur. Hesar kvotur eru upprunaliga settar inn fyri at fáa javnvág í avtalurnar.

Í avtalunum er grein um, at partarnir vilja virka fyri samstarvi millum vinnuna í Føroyum og Baltisku londunum.

Hjálagt er yvirlit, ið vísir kvoturnar frá 1992 til 1995.

1. viðgerð 31. januar 1995. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 18. apríl 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 27. januar 1995 og eftir 1. viðgerð 31. januar 1995 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini havt fund við landsstýrismann Ivan Johannesen, Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóra, og Ullu Svarrer Wang, fulltrúa.

Landsstýrisumboðini greiddu frá, at avtala verður gjørd við hvørt einstakt av teimum trimum baltisku londunum Estland, Letland og Litavia. Tað er bert sum løgtingsmál, at hesar avtalur verða viðgjørdar saman.

Undir viðgerðini í nevndini kom fram, at tað av fleiri orsøkum er sera trupult at gangnýta føroyskn loyvini í estiskum, lettiskum og litaviskum sjógvi. Harafturat vísir gongdin í samráðingunum við hesi lond, at ilt er at meta um framtíðarútlitini í sáttamálunum.

Hóast nevndu trupulleikar metir marknaðarnevndin, at tað hevur týdning at varðveita søgulig rættindi í baltiskum sjógvi, eisini til tess at skunda undir at menna vinnuligt samstarv á øðrum økjum millum Føroyar og baltisku londini, og mælir ein samd nevnd tí løgtinginum til at samtykkja uppskotið til samtyktar. Viðvíkjandi framhaldandi avtalum millum Føroyar og baltisku londini verður víst til álitið í løgtingsmáli nr. 78/1994.

2. viðgerð 21. apríl 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

78 Skipan millum Føroyar og Russland um sínámillum fiskirættindi í 1995

Ár 1995, friggjadagin 27. januar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir hjáløgdu avtalu frá 25. november 1994 millum Føroyar og Russland um sínámillum fiskirættindi í 1995.

Viðmerkingar:

Váttaða frásøgnin frá 18. fundinum í føroysku-russisku felags-nevndini um sínámillum fiskivinnumál er hjáløgd. Samráðingarnar fóru fram í Astrakhan í Russlandi 22.- 25. november 1994.

Eins og í sáttmálunum frá 1992 er grein um, at partarnir vilja arbeiða fyri víðkaðum samstarvi millum feløg og virki innan fiskivinnuna. Ein serlig nevnd skal setast í seinasta lagi í januar 1995 at fáa gongd á hetta. Víst verður til grein VIII í váttaðu frásøgnini.

Fyritreytirnar fyri samráðingunum:
Í norsk-russisku sínámillum fiskivinnunevndini ásetta londini, hvussu stór heildarveiðin skal vera í Barentshavinum, og hvussu nógv kann latast triðjalondum.

Fyri 1995 er TAC'ið á toski óbroytt, 700.000 tons, sum í 1994. Triðjalandskvotan er somuleiðis óbroytt í 1995, hjá Noregi 36.000 tons og hjá Russlandi 24.000 tons.

Gongdin í TAC-num fyri tosk í Barentshavinum hevur verið henda:

	TAC frá fiskifrøðingum	Heildarkvota ásett
1986	< 446.000	400.000
1987	< 645.000	560.000
1988	(530.000) 363.000	(578.000) 451.000
1989	300.000	360.000
1990	172.000	163.000
1991	215.000	215.000
1992	300.000	300.000

1993	500.000	500.000
1994	700.000	700.000
1995	700.000	700.000

Heildarkvotan fyri hýsu í 1995 er ásett til 130.000 tons, 10.000 tons meir enn fyri 1994. Men triðjalandskvotan í 1995 er óbroytt, hjá Noregi 4.800 tons og hjá Russlandi 3.200 tons.

Eingin lodnuveiða verður loyvd í 1995.

Úrslit av samráðingunum:
Fyri 1995 minkar føroyska kvotan av toski við 2.000 tonsum, úr 18.600 tonsum í 1994 niður í 16.600 tons. 1.000 tons í royndarveiðu eftir skel eru tikin burtur úr sáttmálanum. Annars er sáttmálin viðvíkjandi fiskiskapi órbroyttur.

Russiska kvotan av svartkjafti er 140.000 tons, og er hetta sama kvota sum í 1994. Íroknað hesi kvotu er 15% hjáveiða av makreli og 5% hjáveiða av sild loyvd.

Hjálagt er yvirlit yvir føroysku og russisku kvoturnar 1990-1995.

1. viðgerð 31. januar 1995. Málið vurð beint í marknaðarnevndina, sum 18. apríl 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. januar 1995 og eftir 1. viðgerð tann 31. januar 1995 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt uppskot landsstýrisins og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum Ivan Johannesen, Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóra og Ullu S. Wang, fulltrúa.

Á hesum fundi greiddu umboðini fyri landsstýrið frá, at landsstýrið eisini í 1995 metir, at Føroyar hava fyrimun av avtaluni um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Russland, hóast føroyska toskakvotan í russiskum sjógvi er minkað við 2000 tonsum og hóast einki loyvi verður latið føroyskum bátum til royndarveiðu eftir skel.

Marknaðarnevndin vísti á, at í russisku kvotuni av svartkjafti uppá 140.000 tons er íroknað 15% hjáveiða eftir makreli, og at hetta hjáveiðuprosent er sera høgt. Umboðini fyri landsstýrið vóru samd við nevndini, at vandi er fyri, at Føroyar lata størri nøgd av makreli til onnur lond, enn ta nøgd sum loyvd verður at veiða í føroyskum sjógvi í

1995. Sostatt verur helst heldur eingin makrelur til føroysk skip. Uppá fyrispurning í samband við punkt VI, g í fundarsamtyktini svaraðu landsstýrisumboðini, at punkt VI, g skal skiljast á tann hátt, at Føroyar binda seg til ikki at fara í loynikrókin við føroyskum skipum.

Undir viðgerðini í nevndini kom fram, at tað er ein spurningur, hvørt russar eisini í framtíðini verða sinnaðir at lata losk í russiskum sjógvi fyri svartkjaft í føroyskum sjógvi.

Eftir hesa viðgerð mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskotið til samtyktar. Men grundað á viðmerkingar nevndarinnar heitir marknaðarnevndin á landsstýrið, áðrenn næstu samráðingar við Russland og við tey Baltisku londini, at viðgera spurningin um støðið undir framhaldandi avtalum við hesi lond saman við marknaðarnevnd og fiskivinnunevnd løgtingsins, og setir marknaðarnevndin tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at viðgera spurningin um støðið undir framhaldandi fiskiveiðuavtalum millum Føroyar og Russland og Baltisku londini saman við marknaðarnevnd og fiskivinnunevnd løgtingsins, áðrenn næstu samráðingar verða.

2. viðgerð 21. apríl 1995. Uppskot nevndarinnar samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins samtykt við 26-0 atkvøðum.

79 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum

Ár 1995, fríggjadagin 27. januar legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992 um skrásetingargjald á motorakførum v.m. við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Í § 2, stk. 1, verður skoytt uppí sum síðsta punktum:

"Landsstýrið fær heimild til við kunngerð at áseta frádráttin og neyvari reglur í samband við trygdarútgerðina."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 175 af 18. december 1992 om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v. med senere ændringer foretages følgende ændring:

I § 2, stk. 1. tilføjes som sidste punktum:

"Landsstyret får hjemmel til med bekendtgørelse at fastsætte fradraget og nærmere bestemmelser i forbindelse med sikkerhedsudstyret."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Millum aðru og triðju viðgerð av løgtingsmáli nr. 63/1994: Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum v.m. varð eitt uppskot lagt fram um frádráttir fyri trygdarútgerð. Hetta uppskot varð samtykt.

Men av óskotni er eingin heimild givin landsstýrinum, til við kunngerð at kunna áseta frádráttin í samband við trygdarútgerðina. Hetta ger, at lógin, sum hon nú er samtykt, als ikki kann umsitast.

Landsstýrið leggur tí fram uppskot til broytingar í samtyktu lógini, soleiðis at neyðug heimild verður útvegað.

1. viðgerð 31. januar 1995. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 31. januar 1995. Uppskotið samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 31. januar 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lóg nr. 23 frá 9. februar 1995.

80 Royndarveiða eftir stórhvali

Ár 1995, fríggjadagin 27. januar legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at kanna møguleikarnar at fara undir royndarveiðu eftir stórhvali í føroyskum sjóøki.

Viðmerkingar:

Játtandi tað neyðuga í at taka uppaftur royndarveiðu eftir stórhvali og framhaldandi savna saman upplýsingar, sum eru ómissandi fyri einari sunnari og konstruktívari viðgerð - evt. veiðu - av tí hvalastovni, sum ein stóran part av árinum er í okkara stóra sjóøki, meta vit tað neyðugt, at vit fáa okkara part av tí náttúrugivna tilfeingi, ið finst her, og samstundis kunna vera við at gera tær vísindaligu royndirnar, sum neyðugar eru.

Føroya land er ógvuliga lítið, men vit eiga eitt ógvuliga stórt hav um oyggjar okkara. Sjóøkið innan fyri fiskimarkið er knapt 90.000 fj.^{2} (kvadratsjómil) - uml. 275.282 km.^{2}, og er tað sjálvsagt, at vit kanna, hvat ríkidømi hetta ber í sær, eisini hvat stórhvali viðvíkir.

Frá 1894 og fram til seinna heimsbardaga hava vit rikið stórhvalaveiðu við Føroyar. Henda veiða gav arbeiði til nógvar hendur bæði við Áir og suðuri í Lopta, og gav hetta stóra virksemið í sínari tíð til tíðir stóra inntøku. Menn saltaðu sær tvøst upp í heilar tunnur, tí hvalatvøst kostaði føroyingum lítið at keypa. Eftir seinna heimsbardaga helt hvalaveiðan fram, sum hjáløgdu avrit eisini vísa.

Í 1980'unum fór fram royndarveiða eftir stórhvali, men tey allarseinastu árini hevur eingin royndarveiða verið.

Skip og bátar, ið fiska og annars sigla í føroyskum sjóøki, siga frá nógvum stórhvali, og vaktarskip okkara føra dagbók yvir hval teir síggja.

Eingin ivi er um, at allir føroyingar kundu ynskt, at vit skutu stórhval við Føroyar, men vit tora bara ikki at veiða tað, sum er okkara sjálvsagdi rættur, tí Greenpeace hóttir okkum. Noreg er ikki í iva um at geva loyvi til stórhvalaveiðu, og Ísland fer aftur undir royndarveiðu eftir stórhvali. Hví kunnu vit so ikki eisini?

Nógv lond hava eisini gjørt vísindaligar hvalakanningar við at veiða stórhval, eitt nú California, Canada, Japan, Chile, Ísland o.s.fr.

Í einari roynd at steðga Íslandi í at halda fram við vísindaligu royndarveiðuni viðtók IWC eina fundarsamtykt, sum skuldi minka um útflutningin av hvalatvøsti frá vísindaligum hvalaroyndum, men bæði Japan, Noreg og Sovjet løgdu veto ímóti forboðnum. Loyvi varð tó givið til royndarveiðu, um tvøstið varð nýtt í landinum. Hetta kom Íslandi ógvuliga illa við, tí teir eta ógvuliga lítið av hvalatvøsti. Føroyingum dámar væl hvalatvøst, og tað er einki at ivast í, at alt tvøstið frá royndarveiðuni kann seljast ódýrt her í landinum, so sum fyriskrivað er í altjóða reglum.

Tá stórhvalastovnurin einaferð er komin so frægt fyri seg aftur, at hvalaveiða verður loyvd, mugu føroyingar tryggja sær sín part, og tað gerst við at vísa á søgulig rættindi og vísindaligar royndir, sum vit eru við at gera. Tí er tað lítið hugsandi, at nakar vil mótmæla, um føroyingar fara undir at skjóta stórhval til vísindaligt endamál.

Um føroyingar fáa loyvi til at skjóta stórhval til vísindaligt endamál, er tað ein sjálvfylgja, at vit vilja halda allar altjóða meginreglur, sum gera, at øll verða nøgd.

Verður farið undir stórhvalaveiðu, má tað ikki vera eins og í Íslandi, at veiða nógv. Tiltakið bæði er og sær trúligt út, um vit bert skjóta nakrar fáar hvalir, og onnur fáa ta fatan, at skjótingin ikki er høgt prioriterað. Um vit bert skjóta einar 10 - 15 hvalir, so er tað eisini ógvuliga lítið í mun til Noreg, sum í árunum frá 1989 til 1992 skeyt 800 hvalir.

1. viðgerð 2. februar 1995. Málið varð beint í fiskivinnunevndina. Ikki liðugt viðgjørt.

81 Veðurtænasta og fráboðanarskipan fyri útróðrarbátar

Ár 1995, fríggjadagin 27. januar legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at kanna møguleikarnar fyri einari fráboðanarskipan fyri útróðrarbátum og veðurtænastu úrr Akrabergi, Boðanesi, Mykinesi, Fugloynni og Kalliuum.

Viðmerkingar:

Fastlønt og tímalønt fólk hava verið knýtt at vitanum á Akrabergi alt síðani hesin var reistur og er tað tí løgið, at fólk nú eru søgd upp, so bert ein maður skal vera knýttur til vitan.

Vitin í Akrabergi hevur gjørt tænastu bæði í friðartíð og krígstíð og mong merki standa í vitanum, sum bera boð um skotriðini frá flúgvarum, sum gjørdu álop á vitan.

Flogfør, ið dagliga flúgva yvir Føroyum hava samband við vitan og útlendsk og ikki minst okkara egnu skip hava dagliga samband við vitan.

Akraberg er sunnasti endi landsins og Røstin er eitt av ringastu sjóøkjum at fara um. Har sigla okkara sjómenn dag og nátt, tí Munkagrunnurin er eitt av ríkastu fiskimiðum okkara.

Útsýnið úr Akrabergi er gott, og um ikki so gott vaktarhald hevði verið har, kundi mong ein ólukka verið hend. sjómenn hava dagliga samband við Akraberg, og er hetta ein tryggleiki hjá hesum monnum.

Í Íslandi er ein skipan, har øll fiskifør eisini opnir bátar skulu boðað frá, tá ið farið verður frá landi.

Heudan skipan átti eisini at verið sett í gildi í Føroyum, og tá hevði tað eins og í Íslandi verið neyðugt við einari vaktarskipan í Akrabergi, so bátar og skip kundu boðað teimum

frá, nær teir fóru frá landi og hvar teir vóru staddir á sjónum.

Útróðrarmenn og onnur við stúra, nú hópuppsagnirnar í Akrabergi eru settar í verk, at henda skipan í seinasta lagi kann koma at kosta mannalív. Mangan hevur Akraberg boðað frá uppstoppaðum bátum og fiskiførum, ið eru við at reka á land ella reka í Røstina. Nú vandi er fyri, at hesin tryggleiki verður tikin frá okkara sjómonnum, eigur Føroya landsstýri at gera vart við hetta hjá avvarandi myndulcikum og sjálvt fara undir at finna eina loysn, eins og gjørt varð við føroysku veðurtænasturna fyri nøkrum árum síðani. Henda veðurtænasta eigur at verða viðkað, so at føst veðurtíðindi eisini fáast av Borðuni, Mykinesi og Fugloynni.

1. viðgerð 2. februar 1995. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiligi Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 27. januar 1995 og eftir 1. viðgerð tann 2. februar 1995 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í eina meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Karl Robert Johansen, Álvur Zachariasen, John Petersen og Heini O. Heinesen) vísir á, at uppskoti til samtyktar er í tveimum. Í fyrsta lagi snýr uppskotið seg um at kanna møguleikarnar fyri einari fráboðanarskipan fyri útróðrarbátar. Meirilutin vísir á at útróðrarmenn upplýsa, at teir hava gott samskifti, bæði bátanna millum, og í millum bátar og land og halda tí ikki tað verða neyðugt við einari lógarásettari fráboðannarskipan. Annars hevur felagið "Fiskimannakonur" reist málið og hevur havt fund við landsstýrið og Vaktar- og Bjargingartænastuna um eina fráboðanarskipan. Tá arbeitt verður við málinum setur meirilutin eitki uppskot fram um fráboðannarskipan fyri útróðrarbátar.

Í øðrum lagi snýr uppskotið seg um veðurtænastuna. Vitarnir í Føroyum eru automatiseraðir og Vitaverkið hevur gjørt av, at tað ikki longur skal vera fast døgnvakt við vitarnar og tí er ikki gjørligt, at veðurtænastan, sum higartil hevur verið við vitarnar, beldur fram soleiðis, sum hon hevur verið. Fiskivinnunevndin hevur, áðrenn fyriliggjandi uppskot er framlagt, havt fund við stjóran fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna, Jóhan Ziskason, um málið um framhaldandi veðurtænastu og greiddi hann nevndini frá, at Vaktar- og Bjargingartænastan arbeiðir við málinum um veðurtænastuna framyvir. Á fundinum heitt nevndin á Vaktar- og Bjargingartænastuna um skjótast gjørlig at loysa málið. Meteorologisk Instituts Radiosondestød í Tórshavn - Veðurstøðin - fær tríggjar ferðir um dagin veðurfráboðanir úr Fugloy, Mykinesi og Akrabergi og verða hesar lisnar inn á automatiskan telefonsvarara á støðini. Harumframt hevur Veðurstøðin automatiskan avlesara av vindmátaranum í Mykinesi, so støðin altið kann upplýsa ætt og vindferð í Mykinesi, og arbeitt verður við at fáa automatiskan avlesara

frá vindmátaranum í Akrabergi. Av Veðurstødini verður upplýst, at automatiski telefonsvararin fær millum 70 og 80 uppringingar um samdøgrið. Út frá hesum setir meirilutin eink: uppskot fram.

Minnilutiu (Jákup Olsen) mælir løgtinginum til at samtykja fyriliggjandi uppskot.

2. viðgerð 19. mai 1995. Uppskotið fall við 4-0 atkvøðum.

82 Broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (Universitas Færoensis)

Ár 1995, hósdagin 23. februar legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya (Universitas Færoensis).</u>

<u>§ 1.</u>

Í løgtingslóg nr. 65 frá 21. mai 1987 um Fróðskaparsetur Føroya (Universitas Færoensis), sum broytt við løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1990, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"**§ 1.** Fróðskaparsetur Føroya er sjálvsognarstovnur, ið hevur til endamáls at inna gransking, geva frálæru á hægri stigi og breiða út kunnleika um vísindalig háttaløg og úrslit."

2) Í § 4 verður sum stk. 2 sett:
"<u>Stk. 2.</u> Fróðskaparsetrinum verður

<u>lagtingslov om ændring af lagtingslov om Fróðskaparsetur Føroya (Universitas Færoensis).</u>

<u>§ 1.</u>

I lagtingslov nr. 65 af 21. maj 1987 om Fróðskaparsetur Føroya (Universitas Færoensis), som ændret ved lagtingslov nr. 78 af 12. juni 1990, foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 1 affattes således:
"**§ 1.** Fróðskaparsetur Føroya (det færøske universitet) er en selvejende institution, der har til opgave at drive forskning, give højere undervisning og udbrede kendskab til videnskabelige metoder og resultater."

2) I § 4 indsættes som stk. 2:

heimilað at útvega sær ymsar innløkur og stuðul til ávís endamál."

3) § 8 verður orðað soleiðis:
"§ **8.** Rektarin verður valdur fyri eitt 3 ára skeið í senn millum fasta vísindastarvslið fróðskaparsetursins av limunum í megindeildarráðunum. Leggur rektarin frá sær í valskeiðinum, verður skipað fyri nývali fyri ta tíð, sum er eftir av valskeiðinum. Rektarin kann ikki um somu tíð vera megindeildarformaður."

4) § 9 verður orðað soleiðis:
"§ **9.** Fyri rektaran er vararektari, sum verður valdur av setursráðnum millum megindeildarformenninar fyri 1 ár í senn."

5) § 10 verður orðað soleiðis:
"§ **10.** Rektaranum til handar er fyrisiting við setursskrivara á odda."

6) § 11, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Limir í setursráðnum eru rektarin og megindeildarformenninir, heruppií tann, ið er vararektari. Rektarin er formaður, og vararektarin er næstformaður."

7) § 11, stk. 3 verður strikað.

8) § 11, stk. 4 verður stk. 3, og har verða orðini "tvær ella fleiri" strikað.

9) Í § 12, stk. 4 verður orðið "næmingum" broytt til: "studentum".

10) Í § 12, stk. 5 verður orðið "lærarar" broytt til: "vísindastarvsfólk".

11) Í § 12, stk. 6 verður orðið "lærarum" broytt til: "vísindastarvsfólkum".

12) Í § 12, stk. 7 verður orðið "næmingar" broytt til: "studentar".

13) § 13, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Stk. 3. Hvørt megindeildarráð hevur 6 limir, sum tey, ið eru knýtt at megindeildini, velja sínámillum soleiðis: Fasta vísindastarvsliðið velur 2 limir sínámillum og uttansetursláararnir 1 lim sínámill-

"Stk. 2. Universitetet bemyndiges til at tilvejebringe forskellige indtægter og støtte til bestemte formål."

3) § 8 affattes således:
"§ **8.** Rektor vælges for 3 år ad gangen blandt universitetets faste videnskabelige personale af medlemmerne i fakultetsrådene. Fratræder rektor i valgperioden, afholdes der nyvalg for den resterende del af valgperioden. Rektor kan ikke samtidig være dekan."

4) § 9 affattes således:
"§ **9.** Rektors stedfortræder er prorektor, der vælges af universitetsrådet blandt dekanerne for 1 år ad gangen."

5) § 10 affattes således:
"§ **10.** Til rektors rådighed står en administration under ledelse af en universitetssekretær."

6) § 11, stk. 2 affattes således:
"Stk. 2. Medlemmer af universitetsrådet er rektor og de øvrige dekaner, herunder den, der er prorektor. Rektor er formand, og prorektor er næstformand."

7) § 11, stk. 3 udgår.

8) § 11, stk. 4 bliver stk. 3, og der udgår ordene "to eller flere".

9) Óbroytt.

10) I § 12, stk. 5 ændres ordet "lærere" til: "videnskabsmænd".

11) I § 12, stk. 6 ændres ordet "lærere" til: "videnskabsmænd".

12) Óbroytt.

13) § 13, stk. 3 affattes således:
"Stk. 3. Hvert fakultetsråd har 6 medlemmer, der vælges af og blandt personer med tilknytning til det pågældende fakultet således: 2 medlemmer vælges af og blandt det faste videnskabelige personale, og 1 medlem vælges af og blandt de eksterne lærere for 3 år ad gangen. Er ingen ekstern lærer opstillet, vælger det

um fyri 3 ár í senn. Er eingin uttanseturslærari uppstillaður, velur fasta vísindastarvsliðið 3 limir. Starvsfólkið velur 1 lim sínámillum fyri 3 ár í senn. Studentarnir velja 2 limir sínámillum fyri 1 ár í senn. Tann, ið er næstur í atkvøðutali, er tiltakslimur."

14) § 13, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"Stk. 4. Hvørt megindeildarráð velur megindeildarformann fyri 3 ár í senn og næstformann fyri 1 ár í senn millum limirnar, ið umboða fasta vísindastarvsliðið á megindeildini."

15) Í § 14, stk. 6 verður orðið "lærarum" broytt til: "vísindastarvsfólkum".

16) Í § 14 verður sum nýtt stk. 7 sett:
"Stk. 7. Megindeildarráðini taka avgerð í málum um starvssetan, starvsloysn og farloyvi hjá starvsfólki."

17) § 14, stk. 7 verður hereftir stk. 8, og har verður orðið "næmingar" broytt til: "studentar".

18) Í § 14 verður sum nýtt stk. 9 sett:
"Stk. 9. Megindeildarformaðurin tekur avgerð í málum, ið ikki tola steðg og ikki kunnu bíða eftir viðgerð í megindeildarráðnum. Boð um tiknar avgerðir verða at geva ráðnum sum skjótast."

faste videnskabelige personale 3 medlemmer. Af og blandt det teknisk/administrative personale vælges 1 medlem for 3 år ad gangen. Af og blandt de studerende vælges 2 medlemmer for 1 år ad gangen. Den, der får næstflest stemmer, er suppleant."

14) § 13, stk. 4 affattes således:
"Stk. 4. Hvert fakultetsråd vælger dekan for 3 år ad gangen og prodekan for 1 år ad gangen blandt de medlemmer, der repræsenterer det faste videnskabelige personale ved fakultetet."

15) I § 14, stk. 6 ændres ordet "lærere" til: "videnskabsmænd".

16) I § 14 indsættes som nyt stk. 7:
"Stk. 7. Fakultetsrådene træffer afgørelse i sager om ansættelse, afsked og orlov forsåvidt angår det teknisk/administrative personale."

17) § 14, stk. 7 bliver herefter stk. 8, men er iøvrigt uændret.

18) I § 14 indsættes som nyt stk. 9:
"Stk. 9. Dekanen afgør sager, der ikke tåler opsættelse og ikke kan afvente behandling i fakultetsrådet. Meddelelse om de trufne beslutninger gives snarest til rådet."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Eftir løgtingslóg nr. 65 frá 21. mai 1987 um Fróðskaparsetur Føroya sum broytt við løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1990 eru val av rektara og vararektara farin fram í 1987, 1990 og 1993, og val av ikki føstum limum í setursráðið og val av limum í megindeildarráðini eru farin fram somu ár, val av studentaumboðunum tó á hvørjum ári.

Royndir Fróðskaparsetursins av valunum og av arbeiðinum millum valini hava havt við sær, at ein bygnaðarbólkur, sum Fróðskaparsetrið hevur sett í sambandi við spariætlan landsstýrisins og løgtingsins, hevur gjørt uppskot um ávísar broytingar í nevndu valreglum og aðrar smærri broytingar í hesum sambandi, og setursráðið hevur samtykt at mæla landsstýrinum til at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um hesar broytingar og herumframt um eina broyting, sum heimilar Fróðskaparsetrinum at hava inntøkur umframt játtanina á fíggjarløgtingslógini. Hugsað verður um inntøkuskapandi virksemi í sambandi við prosjektarbeiði, sølu av undirvísingar- og granskingarførleika og lønt arbeiði fyri stovnar í Føroyum og útlondum, sum vanligt er á hægri lærustovnum í Norðurlondum.

Høvuðsbroytingarnar í valreglunum eru, at vararektari, í staðin fyri at verða valdur á sama hátt sum rektari, verður valdur av setursráðnum millum megindeildarformennirnar, og at starvsfólkið og næmingarnir, sum eftir higartil galdandi reglum hava valt umboð í bæði setursráðið og megindeildarráðini, framyvir bert velja umboð í megindeildarráðini.

1. viðgerð 16. mars 1995. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 22. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 23. februar 1995 og við 1. viðgerð 16. mars 1995 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Menntannar- og skúlanevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hava umboð fyri Fróðskaparsetur Føroya verið á fundi og givið frágreiðing til nevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan A. Johannessen, Finnbogi Arge, Kristian Magnussen og Óli Breckmann) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Signar á Brúnni) førir fram:

Fróðskaparsetur Føroya er einasti lærustovnur av sínum slag í landinum og hevur alstóran týdning í samfelagnum. Raksturin verður fíggjaður á løgtingsins fíggjarlóg.

Játtanin til Fróðskaparsetrið er skerd munandi tey seinastu árini, og er hon komin so langt niður, at hon kann ikki skerjast meira, skal setrið halda fram við tí virkseminum, ið er. Í uppskoti landsstýrisins verður mælt til, at fróðskaparsetrinum verður heimilað í lóg at kunna fáa til vega inntøkur á annan hátt, enn bert um fíggjarlógina.

Undir 1. viðgerð høvdu einstakir tingmenn ta fatan, at um uppskotið varð samtykt, so

hevði fróðskaparsetrið møguleikar at fortjena stóra upphæddir, og harvið kundi játtanin á løgtingsins fíggjarlóg skerjast samsvarandi.

Undir nevndarviðgerðini varð uppyst av umboðum fyri fróðskaparsetrið, at setrið hevði smáar møguleikar, fyri ikki at siga ongar, at fáa sær inntøkur á henda hátt.

Harumframt varð upplýst, at skrivstovustjórin á landsskrivstovuni, ið er løgfrøðingur, helt tað vera óneyðugt at biðja um nevndu heimild.

Landsstýrið skjýtur somuleiðis upp, at setursráðið verður valt øðrvísið enn higartil.

Umboðini fyri fróðskaparsetrið upplýstu fyri nevndini, at tað var landsstýrið, ið sat í 1992, ið mælti til at fremja broytingar á nevnda øki, og setrið hevði tikið tað til eftirtektar.

Broytingarnar bera m.a. í sær, at næmingarnir á fróðskaparsetrinum fáa minni ávirkan á virksemi stovnsins í framtíðini, enn teir hava havt higartil.

Minnilutin (Signar á Brúnni) tekur ikki undir við nevndu ætlan landsstýrisins.

Heldur ikki tekur sami minniluti undir við at geva fróðskaparsetrinum heimild til at skaffa sær inntøkur aðrar vegir enn um fíggjarlógina, av tí orsøk, sum longu er nevnd, at hetta er óneyðugt sambært løgfrøðing.

Minnilutin (Signar á Brúnni) minnir á, at fróðskaparsetrið er einasti stovnur av sínum slagi í landinum, og hevur ómetaliga stóran týdning, tí er tað av alstórum týdningi, at stovnurin á hvørjum ári fær eina rímiliga játtan á løgtingsins fíggjarlóg, so hann sleppur undan tí fíggjarliga ágangi honum hevur verið fyri og sum hava skapt ótrygg viðurskifti.

2. viðgerð 24. mai 1995. Uppskotið samtykt við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð 29. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

Lóg nr. 84 frá 13. juni 1995.

83 Samráðingar um undirgrundarmark

Ár 1995, fríggjadagin 27. januar legði Finnbogi Ísakson, løgtingsmaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at løgmaður sum treyt fyri samráðingum ella samrøðum við bretska uttanríkisráðharran um undirgrundarmarkið millum Føroyar og Bretland setir, at umboð fyri føroysku/donsku samráðingarnevndina um undirgrundarmarkið verður/verða við á fundinum.

Viðmerkingar

Tað tykist, sum at ein einsamallur maður, løgmaður, meira og meira í loyndum røkir tað almenna samskiftið millum Føroyar og umheimin.

Hetta er komið týðiliga fram hesar seinastu dagarnar, tá samráðingar ella samrøður hava verið millum løgmann og ta størstu donsku vinnulívsfyritøkuna. Hvørki løgtingið, økur løgtingsnevnd ella almenningurin fær nakað at vita um, hvat talan hevur verið um á hesum fundum.

Nú er ásett, at bretski uttanríkisráðharrin Douglas Hurd og Edmund Joensen løgmaður skulu hittast í Keypmannahavn at samráðast ella hava samrøður um undirgrundarmarkið millum Føroyar og Bretland. Tað frættist, at teir serkønu, sum hava samráðst um henda spurning, skulu ikki verða við á fundinum.

Undirgrundin kann fáa lívstýdning fyri føroysku tjóðina. Her eigur at verða farið varisliga fram, so at vit føroyingar ikki gerast taparar.

Tí verður hildið, at tað er skeivt, at fundur verður millum bretska uttanríkisráðharran og løgmann um henda ómetaliga stóra spurning uttan so, at onkur serkønur úr føroysku/donsku samráðingarnevndini er við.

1. viðgerð 31. januar 1995. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 2. februar 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Finnboga Ísakson tann 17. januar 1995 og eftir 1. viðgerð 31. januar 1995 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt uppskotið frá Finnboga Ísakson um samráðingar um undirgrundarmark.

Marknaðarnevndin er av teirri áskoðan, at spurningurin um undirgrundarmark Føroya mótvegis Bretlandi hevur altavgerandi týdning fyri framtíð Føroya.

Løgtinginum til kunningar verður tí sagt frá, at longu áðrenn hetta uppskot varð lagt fyri tingið, varð fundur fyriskipaður millum nevndina og Løgmann í samband við, at løgmaður er boðin á fund við bretska uttanríkisráðharran Douglas Hurd 8. februar í ár í Keypmannahavn.

Løgmaður kunnaði marknaðarnevndina um, at fundurin við bretska uttanríkisráðharran er komin í lag í neyvum samstarvi við formannin í føroysku/donsku samráðingarnevndini um undirgrundarmarkið, Árna Olafsson. Somuleiðis verða talipunktini hjá løgmanni fyrireikað av løgmanni og samráðingarnevndini í felag, og upplýst varð fyri marknaðarnevndini, at saman við løgmanni verða á fundinum tveir embætismenn, Tryggvi Johansen av føroysku viðskiftastovuni í Keypmannahavn og Mogens Holm Petersen, serkønur í føroyskum málum (og avloysari Árna Olafsson). Fundurin er fyriskipaður sum ein óformligur fundur, og hava tí hvørki bretski uttanríkisráðharrin ella Føroya løgmaður embætismenn úr samráðingarnevndinum við sær. Orsøkin til tess er, at samráðingarnar á embætismannastigi skulu halda fram eins og áður.

Marknaðarnevndin er neyvt kunnað um tað, sum løgmaður fer at føra fram á fundinum, og hevur marknaðarnevndin staðfest, at í spurninginum um marknatrætuna verður ikki vikið frá teirri samráðingarleið, sum løgd hevur verið, nevniliga at Føroyar góðtaka bert eina miðlinjuloysn í marknatrætuni millum Føroyar og Bretland.

Vísandi til hesar viðmerkingar tekur **ein meiriluti** í marknaðarnevndini (Helena Dam á Neystabø, Bjarni Djurholm, Jógvan Adolf Johannessen, Jógvan I. Olsen, Ingeborg Vinter og Jenis av Rana) ikki undir við uppskotinum til samtyktar.

Ein minniluti (Jógvan Durhuus) tekur undir við uppskotinum til samtyktar.

2. viðgerð 2. februar 1995. Uppskotið fall við 6-0 atkvøðum.

84 Kanningar í samband við skeljaveiðu

Ár 1995, hósdagin 23. februar legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, vegna miðflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum ikki at geva loyvi til skeljaveiðu á landgrunninum norðanfyri, fyrr enn avleiðingarnar av stíkari veiðu nágreiniliga eru kannaðar.

Viðmerkingar:

Fiskirannsóknarstovan hevur víst á, at eini 3000 tons av skeljum kunnu veiðast afturat teim 3000, sum verða veidd á okkara sjóøki.

Í samband við hesi 3000 tons afturat verður einamest hugsað um leiðina norðanfyri.

Áður hevur loyvi til skeljaveiðu á hesum øki verið givið, hóast útróðrarmenn gjørdu vart við síni sjónarmið og ávaraðu móti óhepnum avleiðingum.

Nú landsstýrið ætlar at geva nýggj loyvi, so er tað umráðandi, at sama mistak ikki verður endurtikið, og loyvi givið til hesa veiðu, áðrenn kanningar eru gjørdar av árininum, henda veiða hevur á fiskastovnin og gýtingina á umtalaða øki.

Eftir tógvið stríð eydnaðist tað fyri nøkrum árum síðan at friða gýtingarøkið norðanfyri fyri troling, og hava tí eisini útróðrarmenn í dag vælskiljandi aftur gjørt vart við sína ónøgd og mótmæla, at møgulig loyvi verða givin til troling eftir skeljum norðanfyri.

At skeljastovnurin undir Føroyum tolir økta veiðu, er ikki nóg gott grundarlag fyri støðutøku hjá landsstýrinum til nýggj loyvi!

Spurningurin um, hvørjar óhepnar avleiðingar henda veiða beinleiðis hevur á útróðurin og lívsgrundarlag fiski- og útróðrarmanna v.m. eigur eyðsæð fyrst av verða kannaður og verða alt avgerandi í støðutøku landsstýrisins.

Um ikki verður lurtað eftir útróðrarmonnum, sum longu hava víst á óhepnar avleiðingar av skeljaveiðuni norðanfyri, og/ella um ongar kanningar verða settar í verk, áðrenn møgulig nýggj loyvi verða givin, so hevur tráanin eftir løtuvinningi aftur gjørt seg galdandi við tí kostnaði, at grundarlagið undan útróðrinum á nevnda øki er burtur og harvið inntøkumøguleikarnir hjá mongum á sjógvi og landi munandi skerdir.

Tá líknandi mál varð viðgjørt í tinginum fyri nøkrum árum síðan, førdi Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, fram hesi sjónarmið:
"Sambært norskum bløðum liggja stór botnøki oyðin mong ár framyvir. Norska skeljaveiðan endaði eins skjótt og hon byrjaði. Skeljaveiðan við Bjarnoynna, Jan Mayen og Svalbard gjørdist eitt stuttfreistað ævintýr við álvarsligum fylgjum fyri teir, sum settu pening í hetta og fyri hotnin á skeljaleiðunum.

Hetta er niðurstøðan hjá norsku vísindamonnum Jan Sundet og Michaela Aschan á Norska Fiskaríháskúlanum, sum hava fylgt við skeljaveiðuni frá tí, hon byrjaði.

Ævintýrið er bert tinn ára gamalt. Í 1985 byrjaðu norðmenn at ruyna eftir skeljum við stórum nýtmótans skeljatrolum. Tá veiðan var í hæddini, luttóku 26 trolarar, og øll væntaðu, at skeljaveiðan fór at gerast eitt satt gullnám. Nú er bert ein trolari eftir.

Samanlagt gjørdu norðmenn íløgur fyri 1,5 milliardir krónur í skip og virkir á landi, og hetta varð gjørt upp á rekordtíð. Úrslitið er ikki bert húsagangur fyri nógvar av luttakarunum, men ein vistfrøðilig vanlukka fyri skeljaleiðirnar, og eitt ringt umdømi fyri Noreg sum fiskivinnutjóð. Hetta halda báðir fiskifrøðingarnir, sum hava fylgt skeljaveiðuni neyvt. Vísindamenninir leggja afturat, at av teim 36 kendu sløgunum av botndjórum við Moffen vóru bert 22 eftir seinast, teir kannaðu."

Í fjør boðaði landsstýrið frá, at skeljaveiðan (norðanfyri) ikki verður tikin uppaftur, fyrrenn nærri kanningar eru gjørdar av hesi veiðu.

Nú hevur so landsstýrið avgjørt at loyva skeljaveiðu norðanfyri í tíðarskeiðinum 1. august til 31. december 1995.

Vælskiljandi verður í hesum døgnum hugsað um at fáa økt virksemi í landinum og at skapa nýggj arbeiðspláss - og er tað í sær sjálvum kærkomið, og eiga teir menn, ið ganga undan, rós uppiborið. Politiska ábyrgdin er so at ansa eftir, at tiltøk ikki gerast løtuvinningur og koma aftur um brekku.

1. viðgerð 18. apríl 1995. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum tann 23. februar 1995 og eftir 1. viðgerð tann 18. apríl 1995 beint í fiskivinnunevndina

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini viðgjørt skriv frá Klaksvíkar Útróðrarfelag um skeljaveiðu norðanfyri og eystanfyri.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Karl Robert Johansen, Álvur Zachariasen, John

Petersen og Heini O. Heinesen) vísir á, at tá ið royndarveiðan hjá "Ólavi Hvíta" støðgaði á vári í 1994, upplýsti landsstýrið, at nýggj loyvi til skeljaveiðu verða ikki givin, fyrrenn nærri kanningar eru gjørdar av skeljaveiðuni undir Føroyum. Meirilutin setir tí einki uppskot fram.

Heini O. Heinesen vísir annars á viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 44/1990 (vetrarting): Kanningar í samband við skeljaveiðu.

Minnilutin (Jákup Olsen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

2. viðgerð 19. mai 1995. Uppskotið fall við 6-0 atkvøðum.

85 Ratifikatión av "Montreal-protokollen om stoffer, der nedbryder ozonlaget"

Ár 1995, týsdagin 14. februar legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir, at Danmark strikar ratifikatiónsfyrivarnið fyri Føroyum í samband við "Montreal-protokollen om stoffer, der nedbryder ozonlaget".

Viðmerkingar:
Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrisins støðutakan til, at Montreal-protokollin um evni, ið niðurbróta ozonlagið, við seinni broytingum, verður sett í gildi í Føroyum.

Danmark ratifiseraði "Montreal-protokollen af 16. september 1987 om stoffer, der nedbryder ozonlaget" tann 16. desember 1988 við fyrivarni fyri Føroyum.

Í protokollini er ásett, at partarnir skulu banna inn- og útflutningi av kontrolleraðum (ozonlags-niðurbrótandi) evnum frá og til ikki-partar. Hetta merkir, at ikki-partar (herundir Føroyar) - longu, sum er, ikki lógliga kunnu keypa t.d. freon til at

viðlíkahalda kølianlegg frá pørtunum í protokollini (eitt nú úr Danmark). Protokollin er galdandi í 120 londum, so hetta forboð er sera umfatandi.

Tí verður heitt á Føroyar, bæði fyri at verja ozonlagið og fyri at tryggja, at Føroyar framyvir kunnu fáa hesi evni, at taka støðu til, um protokollin kann setast í gildi í Føroynm.

Danska Miljøstyrelsen hevur greitt frá, at treytirnar í protokollini verða uppfyltar, um nýtslan av evnunum verður gjørd upp og rapporterað hvørt ár, tí mett verður, at nýtslan í Føroyum er sera lítil samanborið við donsku nøgdirnar.

Mælt verður til at samtykkja, at Montreal-protokollina um evni, ið niðurbróta ozonlagið, við seinni broytingum, verður sett í gildi í Føroyum. Í samband við samtyktina verður dentur lagdur á, at treytirnar í protokollini verða mettar uppfyltar, um nýtslan av evnunum verður gjørd upp og rapporterað árliga.

1. viðgerð 17. februar 1995. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 18. april 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 14. februar 1995 og eftir 1. viðgerð 17. februar 1995 beint í umhvørvisnevndina.

Undir 1. viðgerð tók ivi seg upp um annaðhvørt løgtingið fyrr hevur viðgjørt og samtykt hetta sama mál.

Undir viðgerðini gav landsstýrismaðurin í umhvørvismálum lyfti um, at hann skuldi kanna henda spurning og senda umhvørvisnevndini úrslitið.

Nevndin hevur fingið skriv frá landsstýrismanninum, har greitt verður frá, at í mars 1988 varð "Wienerkonventionen om beskyttelse af ozonlaget" samtykt í løgtinginum.

Viðari verður greitt frá, at málið sum nú er lagt fyri løgtingið er: "den til Wienerkonventionen af 22. mars 1985 om beskyttelse af ozonlaget knyttede Montreal-protokol af 16. september 1987 om stoffer, der nedbryder ozonlaget".

At endað verður upplýst, at partarnir í Montreal-protokollini skulu verða partar í Wienerkonventiónini.

Eftir viðgerð í umhvørvisnevndini tann 20. mars 1995 varð niðurstøðan tann, at **ein samd nevnd** tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. april 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

86 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sociale ydelser på Færøerne"

Ár 1995, týsdagin 14. februar legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at "Lov om sociale ydelser på Færøerne" verður sett í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:
Sum kunnugt høvdu grannskoðanarfrágreiðingarnar fyri sosialu útreiðslunum í Føroyum við sær, at allur stuðulin úr statskassanum til tær sosialu útreiðslurnar í Føroyum frá 1. juli 1993 varð umlagdur til blokkstuðul. Samstundis varð avtalað tann 6. apríl 1993, at tað skuldi gerast rammulóg fyri almannaøkið, sum heimilaði heimastýrinum at áseta nærri reglur fyri sosialum veitingum og tiltøkum.

Fyriliggjandi uppskot til "Lov om sociale ydelser for Færøerne" er rammulógin, sum heimilar og áleggur heimastýrinum at skipa fyri tiltøkum, sum í rímiligan mun kunnu fyribyrgja og bøta um sosialar trupulleikar hjá fólki í Føroyum. Lógaruppskotið er tilevnað í samstarvi við Almannamálaráðið.

Sum tað framgongur í viðmerkingunum til lógaruppskotið, so er við hesum talan um stórar broytingar í mun til í dag. So hvørt sum heimastýrið við løgtingslógum uppfyllir rammulógina, hevur heimastýrið eisini ta fullu ábyrgdina av at hava eftirlit við áseettu reglunum sambært løgtingslógunum, bæði innihaldsliga og hvussu tær verða umsitnar av fyrisitingini. Ábyrgdin hevur áður ligið hjá Almannamálaráðnum í Danmark.

Landsstýrið hevur í felagsyvirlýsing dagfest 17. november 1994 mótvegis donsku stjórnini bundið seg til, at í seinasta lagi við árslok 1995 skulu uppskot til nýggja almannalóggávu verða framløgd í løgtinginum, og at løgtingið, tá tingsetan 1995/95 er lokin, hevur samtykt útfyllandi lóggávuna. T.v.s. at uppskot til løgtingslógir skulu gerast, sum skulu koma í staðin fyri núverandi lóggávu: forsorgarlóg, barnaforsorgarlóg, barnagjaldslóg, fólkapensjónslóg, avlamispensjónslóg og dagpeningalóg.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið hevur Almannamálaráðið ikki skyldu til at ausa eftir, at heimastýrið ger tær løgtingslógir, ið skulu koma í staðin fyri tær donsku fólkatingslógimar. Skipanin inniber eisini, at Almannamálaráðið ella danska stjórnin ikki hava rættarliga skyldu til at hava eftirlit við innihaldinum og umsitingini av teimum

løgtingslógum v.m., sum heimastýrið ger við heimild í fyriliggjandi rammulóg.

Til nýggjar løgtingslógir um sosialar veitingar og tiltøk eru settar í gildi, verða tær donsku fólkatingslógirnar verandi í gildi. So leingi hesar donsku fólkatingslógirnar framvegis eru í gildi í Føroyum, er tað eisini almannamálaráðið, ið hevur ábyrgdina á økinum. Men tá løgtingið hevur samtykt nýggjar løgtingslógir, yvirtekur heimastýrið eisini rættarligu ábyrgdina á økinum. Samstundis verða tær donsku fólkatingslógirnar settar úr gildi, og tá hevur Almannamálaráðið ikki longur ábyrgdina fyri almannaøkinum í Føroyum.

Í hesum sambandi eru nú 2 nýggj størv sett av aftrat til almanna- og heilsudeildina, men tað er heilt greitt, at eisini uppá longri sikt má roknast við, at hendan ábyrgdin fyri almannalóggávuni fer at føra við sær, at tað verður neyðugt við størri arbeiðsorku enn tann verandi á almanna- og heilsudeildini á Landsskrivstovuni.

Lógaruppskotið førir í prinsippinum við sær eina broyting viðvíkjandi flyting av pensjónum millum Føroyar og Danmark. Støðan viðvíkjandi pensjónum er í dag, at ein persónur, sum hevur fingið tillutaða fólka- ella avlamispensjón í Føroyum, kann flyta til Danmarkar og har uttan umsókn fáa pensjón útgoldna. Hetta er grundað á, at við verandi lóggávu eru pensjónsskipanirnar í Føroyum og Danmark nærum eins, og tí er hendan automatiska skipanin møgulig.

Hóast tað verður ein prinsipiell broyting, tá vit fáa eina løgtingslóg um pensjónir, so nýtist tað ikki at føra við sær, at føroyingar eins og borgarar frá fremmandum londum mugu søkja um pensjón, tá teir flyta til Danmarkar. Tað veldst um, hvussu nógv øðrvísi føroyska pensjónslóggávan verður í mun til ta donsku pensjónslóggávuna.

Tá ið landsstýrið nú fer undir at fyrireika uppskot til løgtingslóg um pensjón, má tað vera ein týðandi táttur at royna at tryggja, at tað fer at bera til at hava framhaldandi automatiska flyting av pensjón millum Føroyar og Danmark.

Samráðingar um automatiska flyting fara fram í donsk-føroysku nevndini viðvíkjandi føroysku almannalóggávuni. Hetta er ein nevnd hjá Almannamálaráðnum, sum hevur virkað síðani 1959, og sum hevur havt til uppgávu at fyrireika broytingar í føroysku almannalógunum. Sum tað sæst í viðmerkingunum til lógaruppskotið, so er ætlanin, at henda nevndin framhaldandi skal virka sum eitt forum, har sosialur spurningar av almennum áhuga hjá føroysku og donsku myndugleikunum kunnu takast upp og umrøðast.

Sum dømi um avtalaðar reglur, ið tryggja flyting landanna millum, kann vísast til samskipanaravtaluna millum Føroyar og Danmark frá 1993 um arbeiðsloysistrygging.

1. viðgerð 17. februar 1995. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 18. apríl 1995 legði fram soljóðandi

Felagsálit

í

Løgtingsmáli nr. 86/1994: Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sociale ydelser på Færøerne", og
í løgtingsmáli nr. 87/1994: Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne".

Málini vórðu løgd fram av landsstýrinum tann 14. februar 1995 og vórðu afianá 1. viðgerð tann 17. februar 1995 beind í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málini saman.

Nevndin er samd um, at tað liggur eitt stórt og umfatandi arbeiði fyri frammman at útfylla rammurnar bæði á almanna- og heilsuøkinum. Føroyingar fáa nú møguleikan at avgera, hvønn sosilapolitikk vit skulu hava, og hvussu heilsuøkið skal skipast.

Undir nevndarviðgerðini er tó komið fram, at ávísir óytyggleiki er millum limirnar, nú vit sjálvi skulu til at smíðja sosialar lógir og sum frálíður hava alla ábyrgd av almannaøkinum í Føroyum. Hesin ótryggleiki ger seg galdandi, bæði tá talan er um sjálvt lógarsmíði, ið vit ikki hava serliga royndir í, og um rættartrygdina hjá viðskiftafólki.

Beinleiðis orsøkin til, at danir ikki longur vilja hava ábyrgd av sosiala økinum, eru grannskoðarafrágreiðingarnar ið meta, at ymsar sosialar lógir ikki eru umsitnar í tráð við lógina.

Fyri at politikarar kunnu fáa neyðugan førleika at taka størri lut í orðaskiftinum um almanna- og heilsupolitikkin, metir nevndin, at um vit beinanegin áðrenn lógarsmíðið av álvara fer í gongd, eiga at hava aðalorðaskifti um almanna- og heilsuøkið. Tekur løgtingið ikki aktivan lut í útfyllanini av rammunum, er vandi fyri, at lógirnar bert vera umsetingar av donskum lógum. Neyðugt er við breiðari politiskari semju um hesi viðurskifti, fyri at komandi lógir og reglurðir fáa tann stabilitetin, ið krevst, fyri at fólk kunnu hava álit á lógunum.

Ein samd nevnd tekur undir við landsstýrisuppskotunum og mælir tinginum til at samtykkja tey.

Í viðmerkingunum til uppskotið um "lov om socciale ydelser på Færøerne" sigur danska almannaráðið, at sosialu lógirnar skulu vera samtyktar á Ólavsøku 1996.

Vísast kann á, at seinasti "socialreformurin" í Danmark tók 15 ár at seta í verk, og at lógirnar um sosiala pensión tóku 7 ár at viðgera, áðrenn tær komu í gildi í 1984.

Nevndin metir, at tað er heilt burturvið at góðtaka, at líknandi arbeiði í Føroyum kann

gerast á nøktandi støði við so lítlum skothráði, og setur **ein samd nevnd** tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at taka upp samráðingar við danir við kravi um, at tíðarfreistin, nær rammurnar skulu verða útfyltar, verður longd, soleiðis at løgting og landsstýri fáa ta tíð, ið neyðug er, fyri at arbeiðið kann verða gjørt til lítar.

2. viðgerð 20. aprfl 1995. Uppskot landsstýrisins samtykt við 20-0 atkvøðum. Uppskot nevndarinnar samtykt við 18-0 atkvøðum.

87 Ígildissetan fyri Føroyar av "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne", "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse" og "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om embedslægeinstitutioner m.v."

Ár 1995, týsdagin 14. februar legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne", "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om sundhedsvæsenets centralstyrelse" og "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om embedslægeinstitutioner m.v." verða sett í gildi í Føroyum.

Viðmerkingar:
Í samráðingum millum donsku stjórnina og landsstýrið tann 6. apríl 1993 varð semja gjørd um, at rammulógir skulu gerast fyri bæði almanna- og heilsuøkið.

Við felagsyvirlýsingini dagfest 17. november 1994 hevur landsstýrið bundið seg til, at rammulógin skal koma í gildi í seinasta lagi 1. apríl 1995.

Eisini er avtalað millum landsstýrið og donsku stjórnina, at uppskot til nýggjar løgtingslógir innan hesi bæði økini skulu vera framløgd í løgtinginum í seinasta lagi við árslok 1995, og at løgtingið, tá tingsetan 1995/96 er lokin, skal hava samtykt útfyllandi lóggávuna. T.v.s. at uppskot til Iøgtingslógir skulu gerast, sum koma í staðin fyri núverandi lóggávu.

Heilsuøkið er eitt felagsmál, undantikið apoteksverkið og heilivágur, ið var yvirtikið sum sermál longu í 1948.

Fyriliggjandi uppskot heimilar landsstýrinum at ásetta reglur viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum, kommunulæknaskipanini, heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini, skúlalæknaskipanini, tannrøkt og sjúkrakassaskipanini. Hetta merkir, at fyri hendan partin av heilsuøkinum verða reglur ásettar í løgtingslógum.

Økini, sum ikki eru fevnd av rammulógini, eru:
1) Landslæknaembætið,
2) lóg um "Sundhedsvæsenets centralstyrelse",
3) læknalógin,
4) sjúkrasystralógin,
5) lóg um terapiassistentar,
6) lóg um fótterapeutar,
7) tannlæknalógin,
8) lóg um ljósmøður,
9) lóg um kliniskar tannteknikarar,
10) lóg um euforiserandi evnir,
11) lóg um smittandi sjúkur,
12) lóg um nýtslu av røntgensrálum,
13) lóg um eitur og heilsuskaðilig evnir,
14) lóg um nýtslu av radioaktivum evnum,
15) lóg um líkbrenning,
16) lóg um líkskoðan,
17) sinnissjúkralógin,
18) lóg um tiltøk í samband við barnsburð,
19) lóg um barnsburðarrøkt og føðingarhjálp,
20) lóg um læknakanning av børnum,
21) lóg um ókeypis koppseting fyri ávísar sjúkur.

Skipanin fyri hesi økir, sum ikki eru fevnd av § 1, stk. 2 í rammulógini, verður tann sama sum higartil. T.v.s. at á hesum økjum verður lóggávan framhaldandi danskar

fólkatingslógir. Ætlan landsstýrisins er at fáa hesa lóggávuna dagførda, tí í dag eru fleiri av fólkatingslógunum fyri Føroyar ikki í samsvar við tær donsku, sum eru broyttar, uttan at heimastýrið hevur havt høvi til at taka støði til, um lógirnar, sum eru galdandi í Føroyum, skuldu broytast samsvarandi.

Eins og á almannaøkinum er skipanin tann, at til vit hava fingið nýggjar løgtingslógir fyri tey økini, sum rammulógin fevnir um, verða tær verandi donsku lógirnar fyri hesi økini í gildi.

Rammulógin hevur innan heilsuøkið ikki stórvegis broytingar við sær, hvørki fíggjarliga ella umsitingarliga. Hetta er tí, at heimastýrið longu hevur heimild at gera reglur fyri tey økini, sum rammulógin fevnir um. Síðani blokkstuðulsskipanin kom 1. januar 1988, hevur heimastýrið í ávísan mun havt lóggávuheimild á øllum hesum økjum, men hesar heimildir eru at finna í fleiri smærri rammulógum fyri hvørt økið sær.

Innan heilsuøkið er størsta broytingin, sum áður vístá, at landsstýrið nú yvirfyri donsku stjórnini hevur bundið seg til at gera nýggja lóggávu (løgtingslógir) innan rammulógarøkið longu í hesum árinum. Tað má tó metast at vera sera ívasamt, fyri ikki at siga ógjørligt, at halda hesa avtaluna við donsku stjórnina við tí starvsfólkaorku, sum er á almanna- og heilsudeildini, havandi í huga, at serstakliga innan almannaøkið liggur eitt risastórt arbeiði, sum skal gerast av somu deild.

Fylgilóggávan.
Saman við rammulógini verða eisini settar í gildi tvær kongligar fyriskipanir umframt tvær kunngerðir.

Sum tað framgongur á bls. 4 í viðmerkingunum til uppskotið um rammulóg, so er ikki ætlanin at gera nakra broyting viðvíkjandi virksemi landslæknans, av tí at tað eisini framyvir er ætlanin, at hesin vegna heilsustýrið skal hava eftirlit við heilsustøðuni í Føroyum. Tað fakliga eftirlitið innan heilsuøkið verður tí framvegis hjá landslæknanum, sum er umboð heilsustýrisins í Føroyum.

Landsstýrið hevur ynskt at fáa lóggávuna um "Sundhedsstyrelsens centralstyrelse" frá 1932 dagførda, av tí at galdandi lógin í Føroyum er avoldað og sett úr gildi í Danmark í 1987.

Við dagføring av higartil galdandi lóg í Føroyum fyri virkseminum hjá heilsustýrinum verða reglurnar greiniligari enn frammanundan og í meira nútímans sniði. Sama er galdandi fyri reglurnar um frátøku og afturgogning av løggilding til at gera tænastu innan heilsuverkið, umframt reglurnar fyri Statens Seruminstitut. Herumframt eru í lógini reglur um eina sjúklingakæruneynd fyri heilsuverkið, sum skal taka endaliga avgerð í málum viðvíkjandi kærum um tað heilsufakliga virksemi, sum verður framt av starvsfólki innan heilsuverkið.

Annars verður vístil viðmerkingarnar í lógaruppskotinum.

1. viðgerð 17. februar 1995. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 18. apríl 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í løgtingsmáli nr. 86/1994

2. viðgerð 20. apríl 1995. Uppskotið samtykt við 20-0 atkvøðum. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 18-0 atkvøðum.

88 Flakavirkisskipanin aftur á privatar hendur

Ár 1995, fríggjadagin 17. februar legði Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at landsstýrið áleggur almennum stovnum og grunnum, ið eiga partapening í p/f Føroya Fiskavirking, at hesir skulu síggja til, at flakavirkisskipanin aftur kemur á privatar hendur, soleiðis at fløguhugur og fyritakssemi kunnu vekjast og ónyttar framleiðslueindir aftur koma í vinnu.

Viðmerkingar:

25. mars eru nærum tvey ár farin, síðan formaðurin fyri fíggingargrunninum frá 1992 boðaði tásitandi landsstýri frá teimum ætlanum, sum grunnurin hevði, nevniliga at øll tey føroysku flakavirkini skuldu leggjast í eitt monopolfelag, og flestu av teimum skuldu steingjast ella "leggjast í mølposa", sum málburðurin tá var.

Fimm dagar seinni, tann 30. mars 93, mótmælti tásitandi javnaðarløgmaðurin hjá danska forsætisráðharranum í brævi at "*Derimod kan landsstyret slet ikke godtage de tanker, som Finansierinsfonden har fremlagt om et produktionsselskab for alle fabrikkerne*", og at, "*landsstyret mener, at fondens tanker er i strid med aftalen fra 1. februar*

1993".

Sjálvt við hesum harðliga mótmæli frá landsstýrinum hildu ætlanirnar fram ótarnaðar. Hóast hetta bert er fáar dagar eftir partabrævabýtið í bankanum, skrivar formaðurin í Figgingargrunninum frá 1992 í blaðgrein 29. nov. 1994 um strukturtillagingina í fiskivinnuni, at hon "*er en vigtig begrundelse for landsstyrets tilslutning*.. (til partabrævabýtið).

Fólkaflokkurin sá straks vandan við monopolfelagnum og kravdi politiska uppílegging. Men 17. apríl 93 broytti Javnaðarfokkurin støðu og vildi tá ikki leggja upp í politisk. Fólkaflokkurin legði málið so hart upp, at samgongan slitnaði, og onnur samgonga, Javnaðar, Tjóðveldi og Sjálvstýri, varð skipað, sum lat sær øll donsk harraboð lynda, hóast cingin segðist vera glaður fyri ætlaða móðurfelagið og sonevnda mølposan. "Lat tað royna seg, sum onkrir tóku til.

Tíbetur eydnaðist ikki fult út at monopolisera flakavinnuna, tí tað cina danska fíggingarfelagið valdi at ganga í móti og av sínum cintingum sanera flakavirkini á Kósini í Klaksvík og í Hvalba. Øll hini virkini endaðu tíverri í mølposanum.

Nú hevur p/f Føroya Fiskavirking roynt seg, og øll prógv eru fingin fyri, at ávaringarnar frá Fólkaflokkinum vóru væl grundaðar. Tað gerst týðiligari dag frá degi, at henda umskipan av eigaraviðurskiftinum forðar framvøkstri av nýggjum skilvísum framtøkum í høvuðsvinnuni. Ein búskaparskipan, sum eisini Sovjet mátti sleppa.

Vit hava fingið cina óbeinleiðis almenna miðstýring, har nakrir fáir avgera, í hvørjum bygdum, arbeiði skal vera, í hvørjum cinki, og hvørjar skuln verða lagdar í oyði o.s.fr.

Endamálið við hesi frambrotsætlan skuldi verða avlop til virkið. Í dag gongur sjón fyri søgn, at burtur úr 50.000 tonsum av ráfiski hevur p/f Føroya Fiskavirking havt stórt undirskot. Fiskavirking má nú aftur fáa cina stóra sanering, sum fait svarar til cina sanering upp á 90% av upprunaligu lánskuldini, bert 10% kunnu vera eftir av upprunaligu skuldini, fyri at felagið hevur møguleikar fyri at bera seg.

Miðsavningin av råvøruni á fáum plássum í landinum økir munandi um ónøgdina millum manna og vónloysi breiðir seg eisini til annað virksemi. Hóttafallið úti á oyggjunum hevur fingið einstaklingar, fakfeløg, bygdarráð og almen umboð at mótmæla, men ikki kann sigast, at úrslitið sæst eftir.

Bert 8 virkir eru opin, eitt stongt nýliga, og p/f Føroya Fiskavirking krevur almennan studning fyri at lata tað uppaftur.

Í vónloysi yvir syndarligu støðuna í nærumhvørvinum hava frægir borgarar nógva staðni útvegað sær høli í fyrrverandi sláturhúsum, kjallarum, gomlum pakkhúsum, bilskúrum o.s.fr. arbeiða fisk í, meðan nýmótans flakavirki standa stongd við síðuna av. Henda niðurbinding hevur eisini fört við sær, at í bygdum, har virkið er stongt, eru ætlanir at byggja nýtt virki.

Undanførslan fyri monopofyritøku er framvegis vantandi rávøra, og tí kunnu ikki øll virkini vera opin. Sum gongdin hevur verið, síðan p/f Føroya Fiskavirkinng varð stovnað, ganga ikki nógv ár, fyrr enn vit hava fleiri ferðir so nógvar fiskaframleiðarar, sum vit høvdu, tá virkini vóru flest. Tað ber ikki til í longdini at niðurbinda føroyska fólkið og leggja bygdir og heilar oyggjar í oyði.

Mótstøðan móti móðurfelagnum økist. Verður tí skotið upp, at farið verður undir at fáa flakavirkisskipanina aftur á privatar hendur, so at fløguhugur og fyritakssemi kunnu vekjast, og ónýttar framleiðslueindir aftur koma í vinnu.

Tó má ansast eftir, at vitan og royndir, sum p/f Føroya Fiskavirking situr inni við, t.d. um frystan fisk, ikki fellur fyri bakka.

Ein máti at gera hetta upp, er at byrja við teim virkjum, sum standa stongd frammanundan.

Partacigarar í p/f Føroya Fiskavirking eru m.o. Tryggingarsambandið, Fíggingargrunnurin frá 1992 og báðir bankarnir - alt til svars fyri tí almenna. Tað skuldi tí verið lagamanni hjá landsstýrinum at taka upp samrøður við partacigararnar, so áleggjast kann teimum at virka við til at fáa virkini aftur á privatar hendur.

Nógv er skrivað og sagt um kappingarføri. Fólkaflokkurin hevur ferð eftir ferð vísst á tað alneyðuga í at lækka skattatrýstið og kostnaðarstøðið fyri at bøta kappinngarførið. Eisini er neyðugt at bøta handiltsavtalurnar millum Føroya og útheimin.

Kortini stendur fast, at ein vinnulívsbygnaður, sum ber kapping við sær, er fremsta treytin fyri, at bøtt kappingaføri elvir til stórvegis framstig.

Sostatt er ongantíð ov skjótt at fáa flakavirkini aftur á privatar hendur, sum kunnu fara í sunna kapping hvørt við annað.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 17. februar 1995. Við 1. viðgerð tann 4. mai 1995 varð málið beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meiriluta (Jógvan A. Johannessen, Álvur Zachariassen, Jákup Joensen og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskotinum.

Meirilutin ásannar, at tað er ómøguligt at taka undir við uppskoti fólkafloksins tí eingin lógarheimild er til, sum loyvir at ognartaka virkini hjá Føroya Fiskavirking.

Hinvegin heitir meirilutin í ídnaðarnevndini á landsstýrið um at taka upp samráðingar við eigararnar av Føroya Fiskavirking:

Tryggingarsamband Føroya,
Fíggingargrunnin frá 1992,
Føroya Banka og
Skipafelagið Føroyar

um at lata frá sær tey virki, sum ikki eru í nýtslu.

Minnilutin (Kjartan I. Joensen) tekur undir við uppskotinum frá fólkaflokkinum.

Í øðrum lagi verður tikið undir við meirilutanum.

2. viðgerð 30. mai 1995. Álitið varð afturtikið og atkvøðugreiðslan útsett.

30. mai 1995 legði ídnaðarnevndin fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum tann 17. februar 1995.

Við 1. viðgerð tann 4. mai 1995 varð málið beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Adolf Johannessen, Álvur Zachariassen, Jákup Joensen og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskotinum.

Meirilutin ásannar, at tað er ómøguligt at taka undir við uppskoti fólkafloksins, tí eingin lógarheimild er til, sum loyvir at ognartaka virkini hjá Føroya Fiskavirking.

Tí setir meirilutin í ídnaðarnevndini fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við eigararnar av Føroya Fiskavirking:

Tryggingarsambandið Føroyar
Fíggingargrunnin frá 1992
P/F Føroya Banka
P/F Skipafelagið Føroyar

um at lata frá sær tey virki, sum ikki eru í nýtslu.

Minnilutin (Kjartan I. Joensen) tekur undir við uppskotinum frá fólkaflokkinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Í øðrum lagi verður tikið undir við meirilutanum.

Framhaldandi 2. viðgerð 31. mai 1995. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 28-0 atkvøðum. Uppskot fólkafloksins fall við 7-0 atkvøðum.

89 Framtíðarstøða Føroya

Ár 1995, týsdagin 14. februar legði Finnbogi Ísakson, løgtingsmaður, vegna tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

U P P S K O T

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at fremja hesi tiltøk beinanvegin:

1) Sett verður nevnd at gera uppskot til grundlóg fyri Føroyar.
Uppskotið verður lagt fyri løgtingið, og út til fólkaatkvøðu til góðkenningar.

2) Føroysk uttanríkistænasta verður skipað.

3) Ein føroyskur yvirrættur verður stovnaður. Skipan um tilnevning av dómarum verður gjørd soleiðis, at dómarar og fulltrúar hjá sorinskrivaranum og í yvirrættinum eru óheltir av landsstýri og løgtingi.

4) Ákæruvaldið verður skipað sum stovnur undir landsstýrinum.

5) Løgregla, fongsulsverk og kriminalforsorg verða skipað undir landsstýrinum.

6) Føroysk lóggáva verður gjørd fyri ikki yvirtikin sermál og núverandi felagsmál.

7) Loftferðsla, radiosamband, vitaverk, skipaeftirlit og borgarlig tilbúgving verða skipað undir landsstýrinum.

8) Umsitingin av persóns-, familju- og arvarættarligum málum verður skipað undir landsstýrinum.

9) Samráðingar verða við donsku stjórnina og/ella aðrar stjórnir um samvinnu í uttanríkis-, sjúkrahús- og útbúgvingarmálum.

Viðmerkingar.

Nú 47 ár eru liðin, síðani heimastýrislógin fór at virka, er greitt, at tørvur er á einari nýggjari skipan. Sum tíðin er liðin, og møguleikarnir fyri innanhýsis sjálvstýri í Føroyum sambært hesi lóg eru troyttir at ytsta marki og møguliga í summum førum út um ytsta mark, taka fleiri og fleiri ivamál seg upp.

Tey fyrstu árini undir heimastýrinum løgdu løgting og landsstýri serliga dent á at fáa ræði á fíggjarligum viðurskiftum, bæði alment og privat. Týðandi mál á hesum øki, sum vóru yvirtikin sum sermál beinanvegin, vóru skatta- og avgjaldsmál, fíggjarlóg, handilsmál, inn- og útflutningur.

Sambært heimastýrislógini skuldi staturin rinda kostnaðin av og umsita felagsmál, og landsstýri og løgting skuldu gjalda kostnaðin av og umsita yvirtikin sermál.

Fløkja kom tó skjótt í hendu annars greiða skilnað. Ríkiskassin fór at veita endurgjald til yvirtikin sermál, og landskassin rindaði part av felagsmálum.

Tann fíggjarliga gongdin undir heimastýrinum hevur givið vánalígt úrslit, bæði fyri tað almenna, vinnulívið og einstaklingin. Neyðugt er at fáa nýskipað hesi viðurskifti.

Eisini hevur tað vístseg, at tørvur er á at útvega løgtinginum heimild til lóggávu á ymiskum økjum, eitt nú ta borgarligu lóggávuna, rættargangs- og løgreglulóg. Øll slík viðurskifti, sum hava við okkara gerandislív at gera, eru undir danskari lóggávu, og bert fáar broytingar kunna gerast, tá lógirnar verða settar í gildi fyri Føroyar við kongaligari fyriskipan. Í einstøkum førum hava stjórnin og heimastýrið tulkað heimastýrislógina solciðis, at løgtingið hevur fingið lóggávurætt á øki, sum ikki er nevnt millum tey mál í heimastýrislógini, ið kunna yvirtakast sum sermál. Eitt dømi um hetta er navnalóggávan.

Hesi fáu dømi vísa tørvin á at taka ríkisfelagsskapin sum heild til nýggja viðgerð.

Eftir hesum uppskoti verða Føroyar eitt sjálvstøðugt land. Skotið verður upp at gera eina grundlóg fyri Føroyar, sum so skal staðfestast í løgtinginum og á fólkaatkvøðu.

Haraftrat má lóggáva gerast og skipast fyri umsiting av frestandi yvirtøkum sambært heimastýrislógini, og tey málsøki mugu yvirtakast, sum ikki kunna yvirtakast sambært heimastýrislógini.

Føroyingar eru fáment tjóð. Møguleikar verða valla fult út at røkja allar tær uppgávur, sum størri tjóðir kunna røkja. Her er m.a. talan um uttanríkis-, sjúkrahús- og útbúgvingarmál. Umhugsast má eisini, um hjálp eigur at verða fingin uttaneftir at viðgera serstøk rættarmál.

Neyðugt verður tí at samráðast við donsku stjórnina og/ella aðrar stjórnir um framhaldandi samvinnu á hesum økjum.

Vísst verður annars til "Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya" frá 1993, síðurnar 202-205.

1. viðgerð 23. februar 1995. Málið varð beint í serliga nevnd at viðgera framtíðarstøða Føroya, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 14. februar 1995 og eftir 1. viðgerð 23. februar 1995 beint í serliga nevnd at viðgera hetta málið. Í nevndina vórðu vald Jógvan I. Olsen, Anfinn Kallsberg, Marita Petersen, Finnbogi Ísakson, Ingeborg Vinther, Helena Dam á Neystabø, Jákup Olsen og Tordur J. Niclasen.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og ásannandi at málið er sera stórt og trupult at viðgera í æsir, verður mælt til, at málið fær viðari viðgerð í millumtinganevnd, og setir **ein samd nevnd** fram soljóðandi

u p p s k o t

t í l

samtyktar

Serliga nevndin at viðgera løgtingsmál nr. 89/94: Framtíðarstøða Føroya verður gjørd til millumtinganevnd at arbeiða víðari við málinum og at leggja fram aftur áliti í ólavsøkutingsetuni 1995.

2. viðgerð 30. mai 1995. Uppskot nevndarinnar samtykt við 19-0 atkvøðum.

90 Lýsing av sínámillum peningarenslinum millum Føroyar og Danmark

Ár 1995, hósdagin 9. mars legði Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar:

Føroya Løgting heitir á landsstýrið at seta trímannanevnd av húskapar- og fíggjarkønum fólki at greina og lýsa sínámillum peningarenslið millum Føroyar og Danmark. Úrslitið skal leggjast fyri løgtingið á ólavsøku 1995.

Viðmerkingar:

Í kjalarvørrinum av løgtingsmálinum um partabrævaumbýtið í føroysku bankunum hevur fíggjarliga sambandið millum Føroyar og Danmark verið nógv umrøtt.
Serliga hevur árliga blokstuðulveitingin úr ríkiskassanum til heimastýrið fingið drúgva umtalu - ikki minst í dansku fjøimiðlunum.

Eitt, sum eyðkennir hesa umtalu, eru tær einvegis og ofta skeivu upplýsingarnar, sum bornar verða fjøldini. Hesar upplýsingar eru so tað støðið, sum danir byggja sína fatan á, nevniliga, at vit hurturav eru ein útreiðsla fyri danska skattgjaldaran, og at føroyingurin av lyndi er kraddutur og oyðslutur og bert hugsar um at draga til sín so nógvar danskar skattakrónur, sum gjørligt.

Henda fatanin varð styrkt í beinleiðis sjónvarpssending fyri stuttum, har ferð eftir ferð varð borið fram, at veitingin til Føroyar er 1200 mio. kr árliga.
Sum kunnugt er blokkurin uml. 840 mio., og er upphæddin oman fyri blokstuðulveitingina orsakað av teimum dansku málsøkjum, sum burturav hoyra undir ríkismyndugleikarnar.

Størsti parturin av hesi meirupphædd fer til verjuna og inspektiónina runt oyggjarnar. Útreiðslurnar til hetta virksemi stava frá avtalu, sum Danmark hevur við ein triðja part, nevniliga NATO, og verða hesar útreiðslur óivað goldnar ríkinum aftur eftir ávísari endurgjaldsskipan ella eru partur av teim verjuútreiðslum, Danmark hevur undir øllum umstøðum.
Tí var tað burturvið, at eingin gav hesum villleiðandi upplýsingunum ans í sendingini.

Saman við vantandi innliti sum heild um fíggjarliga renslið millum ríkispartarnar, vilja slíkar ósvaraðar upplýsingar merkja støðutøkuna hjá dønum og kanska mongum føroyingi eisini til ríkisfelagsskapin, og harvið skaða fatanina um samstarvið millum

Danmark og Føroyar.

At Føroyar ikki bert eru ein útreiðsla fyri Danmark, men so sanniliga eisini telur við á inntøkusíðuni, eru mong dømi um.
Trupulleiki okkara er tann, at fíggjarliga veitingin til Føroyar er so sera sjónlig. Verður blaðað í fíggjarlógini, kann danska stuðulsveitingin beinleiðis staðfestast á grein fyri grein, lutað sundur til fyrisiting, heilsu-, skúla-, almannaverkið o.s.fr., meðan nógv truplari er at eyðmerkja upphæddirnar, sum fara úr Føroyum og aftur í danska peningakervið.

Men dømini um henda veruleika tróta tó ikki.
Nógv tann størsti parturin av innflutningi okkara kemur úr Danmark, har vørurnar antin eru framleiddar ella koma hendavegin gjøgnum danskar millummenn. Hóast hesin parturin hevur verið nakað minkandi seinastu árini, nú aðrir innflutningsmøguleikar hava verið troyttir, so var hesin parturin í 1994 omanfyri 60% av samlaða innflutninginum (meira enn 1 mia kr).

Hóast innflutningur okkara eins væl kann koma úr Danmark sum úr øðrum londum, so skerst ikki burtur, at danskir millumhandlarar hava netið væl av at útflyta til Føroyar, Ikki minst í áttatiárunum.
Tí kann danski blokkurin eisini roknast sum óbeinleiðis útflutningsstuðul til danskar fyritøkur, sum hava selt her í Føroyum, og hevur stuðulin sostatt m.a. verið við at dekka danskan lønar- og tilfarskostnað.

Eisini hevur danska kongarikið notið gott av føroyska útflutninginum, har uml. 75% (1994) eru farin uttan fyri ríkismørk og sostatt er við at veita danska tjóðbankanum fremmant gjaldoyra. Umroknað pr. íbúgva, so veitir føroyingurin helst meira fremmant gjaldoyra til ríkið enn hvør dani.

Annað, sum er illa lýst, er danska peningaveitingin at bjarga føroyska bankakervinum. Vanliga fatanin aðrastaðni er, at danski skattgjaldarin treytaleyst hevur veitt føroyinginum henda pening. At føroyski skattgjaldarin í dag m.a. bløðir burtur í rentuútreiðslum (nærum 500 mio kr/árið) til danska statin fyri hesi lán, verður neyvan tikið upp á tungu. Heldur ikki er komið í ljósmála, at lánini til bankabjargingina í stóran mun eru farin at bjarga donskum kredittáhugamálum, og at tey tí k. nnu roknast sum donsk hjálp til sjálvhjálp. Harumframt slapp bankabjargingin eisini Indskydergarantifonden undan milliardaveitingum til føroyskar innlánarar.

Í mansaldrar lat eisini størsti bankin í landinum árliga ikki sørt av peningi eftir seg til móðurbankan í Danmark umframt, at allur lógarbundin tiltakspeningur í øllum peningastovnunum í landinum stóð í Danmark.

Strongu krøvini farnu árini til avsetingar í føroyska bankakervinum tryggjaðu samanlagda bankarum ein ovurhonds likviditet. Hesin likviditetur, sum táttar í tvær mia. kr, stendur allur í dag í donskum virðisbrøvum og er sostatt endaður aftur í danska peningarenslinum. Sostatt njóta vit ongan ágóða av hesi øgiligu upphædd, sum vit gjalda

marknaðarrentu fyri, men sum mest av øllum bert kann roknast at vera ein deyðvekt í føroyska peningakervinum.

Og soleiðis kundi verið hildið fram.

Samanumtikið kann tí sigast, at veruleikin í peningaviðurskiftunum millum Føroyar og Danmark er munandi meira fjølbroyttur, enn fjølmiðlarnir lýsa hann. Talan er um samanbundin fíggjarkør, har peningurin rennur báðar vegir landanna millum.

Tískil er neyðugt at fáa hesi viðurskifti betur greinað, so sleppast kann undan slíkum einvegis lýsingum, sum dømi var um í beinleiðis fjølmiðlasendingini herfyri.

Fyri uml. tveimum árum síðani var eitt uppskot á tingborði at kanna týdningin av blokkstuðulveitingini fyri føroyska samfelagið.
Hetta uppskot fekk tó ikki neyðugan meirluta og fall sostatt. Hóast orsøkin fyri tí uppskotinum vóru onnur, so hevur gongdin í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark í seinastuni sýnt, at alneyðugt er at lýsa fíggjarligu viðurskiftini landanna millum.

Í samsvari við veruleikan, verður tí uppskot til samtyktar lagt fyri Løgtingið at greina hesi sínámillum peningarensl landanna millum.

1. viðgerð 21. apríl 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av fólkaflokkinum tann 9. mars 1995. Eftir 1. viðgerð tann 21. apríl 1995 varð málið beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirluta og tveir minnilutar.

Meirlutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariassen, Kristian Magnussen og Tordur J. Niclasen) tekur ikki undir við øllum viðmerkingunum hjá uppskotsstillaranum, men heldur tað tó vera rætt at kanna peningarenslið millum Føroyar og Danmark.

Meirlutin ásannar, at nógvir ósvaraðir spurningar eru í samskiftinum við danska statin og mælir tí til, at setningurin hjá kanningarnevndini verður víðkaður.

Meirlutin heldur, at búskaparliga árinið av blokkstuðulinum eisini eigur at verða kannað í sambandi við lýsingina av peningarenslinum.

Meirilutin ásannar, at kanningararbeiðið hjá nevndini verður so umfatandi, at neyðugt verður at avseta munandi longri tíð til arbeiðið enn uppskotsstillarin ætlaði. Skotið verður upp, at úrslitið av kanningini verður lagt fyri løgtingið í seinasta lagi 1. okt. 1996.

Nakrir av spurningunum, sum meirilutin heldur, at nevndin eigur at viðgera, eru hesir:

1) Hvørja ávirkan hevur blokkstuðulin á føroyska búskapin ?
2) Hvussu ávirkar blokkstuðulin skattainntøkurnar hjá landinum (beinleiðis og óbeinleiðis) ?
3) Hvør er multiplikatoreffektin av veitingini ?
4) Hvussu ávirkar blokkstuðulin kappingarførið hjá vinnuni ?
5) Hvussu ávirkar blokkstuðulin almenna sektorin og aðrar partar av samfelagnum (t.d. privatu handils- og tænastuvinnuna) ?
6) Hvussu ávirkar blokkurin talið av arbeiðsplássum ?
7) Hvørjir fyrimunir og vansar standast av møguligari kapitalisering av blokkinum?

Kanningin eigur at lýsa positivar og negativar avleiðingar av blokkinum. Tað stendur nevndini frítt at gera kanningina í samstarvi við eina ella fleiri bægri lærustovnar ella lesandi, t.d. sum projekt í sambandi við prøvtøku í búskapartrøði.

Við hesum viðmerkingunum setir meirilutin fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta trýmannanevnd av búskaparkønunu fólki at skipa fyri útgreining og lýsing av peningarenslinum millum Føroyar og Danmark og útgreining og lýsing av ávirkanini av blokkveitingini á føroyska búskapin. Úrslitið av kanningini verður lagt fyri løgtingið í seinasta lagi 1. okt. 1996.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar:

Tað sær ikki út til, at allir fíggjarnevndarlimirnir síggja tað neyðuga í at fáa lýst peningarenslið millum Føroyar og Danmark. Treyðugt so, at allir flokkarnir kunnu taka undir við øllum viðmerkingunum og at blokkurin frá Danmark hevur so stóran áhuga politiskt hjá einstøkum flokkum.

Minnilutin fer tí í fyrsta lagi at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot fólkafloksins, og í øðrum lagi at taka undir við uppskotinum frá meirilutanum.

Ein annar minniluti (Finnbogi Ísakson) heldur, at um ein kanning av peningarenslinum millum Føroyar og Danmark skal gerast til lítar, eigur kanningin at umfata bæði renslið sum heild og í ávísum tíðarskeiðum. T.d. kann vera áhugavert at vita,

- hvussu javnvágin í teimum fíggjarligu viðurskiftunum Danmarkar og Føroya ímillum hava verið úr elstu tíðum,

- hvørja ávirkan veitingar úr ríkiskassanum hava havt á uppbyggingina av ymiskum skipanum í føroyska samfelagnum, t.d. á almanna-, sjúkra-, heilsu- og skúlaverkið,

- hvørja ávirkan áhaldandi veitingar høvdu á ta búskaparligu gongdina í 1980'árunum, tá óvanliga nógvur peningur var í samfelagnum,

- hvønn týdning tað hevur havt fyri sølupolitikk okkara, at stórur partur av útflutninginum ávís tíðarskeið er farin til Danmarkar ella um Danmark og okkurt tíðarskeið heilt uttan um Danmark.

Aðrir spurningar eru torgreiddari og kunna ikki gerast upp av búskaparfrøðingum, t.d. tann ávirkan sum herstøðin í Mjørkadali hevur havt á donsku verjuútreiðslurnar, har møguligar spardar útreiðslur eru at rokna sum inntøka fyri statskassan (tað er kunnugt, at Danmark er tað NATO-landið, sum hevur fægstar verjuútreiðslur pr. íbúgva, og kemst hetta ivalcyst av, at herstøðirnar í Føroyum og Grønlandi muna so væl).

Minnilutin heldur, at um farið verður undir eina kanning av hesum slagi, eigur tað komandi føroyska Búskaparráðið at standa fyri henni.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at skipa fyri einari kanning av peningarenslinum Danmarkar og Føroya ímillum nú og ígjøgnum tíðirnar út frá teimum viðmerkingum, sum minnilutin (Finnbogi Ísakson) hevur í hesum áliti.

Búskaparráðið stendur fyri kanningini og kann taka sær serkøna hjálp.

Álit verður lagt fyri løgtingið á ólavsøku 1996.

2. viðgerð 31. mai 1995. Upprunauppskotið afturtikið. Uppskot meirilutans samtykt við 22-0 atkvøðum og uppskot minnilutans fall við 15-0 atkvøðum.

91 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1995, fríggjadagin 10. mars legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:
"**§ 1.** Lógin fevnir um vinnuligt at gagnnýta livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi á sjóleiðum uttan fyri føroysku landleiðirnar. Lógin fevnir somuleiðis um at gagnnýta livandi tilfeingið í føroyskum áum og vøtnum. Lógin fevnir ikki um at gagnnýta hval, kóp, fugl og alifisk."

2) § 5, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 3.** **Veiðuloyvi** sambært hesi lóg er góðkenning, ið Føroya Landsstýri veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku landleiðunum og á leiðum uttanfyri føroysku landleiðirnar."

3) § 5, stk. 9 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 9.** **Stovnsrøktarnevndin.** Landsstýrið velur Stovnsrøktarnevnd. Fiskiveiðifeløgini umboðandi trol- og húkaveiðu hava hvør sínar tveir limir og tiltakslimir í stovnsrøktarnevnd, sum gevur landsstýrinum sítt tilmæli um mest loyvdu veiði. Nevndin verður vald fyri 4 ár í senn. Landsstýrið ger reglugerð um val og virki

lagtingslov om ændring i lagtingslov om erhvervsmæssigt fiskeri.

§ 1.

I lagtingslov nr. 28 af 10. marts 1994 om erhvervsmæssigt fiskeri foretages følgende ændringer:

1) § 1 affattes således:
"**§ 1.** Loven omfatter erhvervsmæssig udnyttelse af de levende ressourcer på det færøske fiskeriterritorium og for fiskefartøjer under færøsk flag på havområder udenfor det færøske fiskeriterritorium. Loven omfatter ligeledes udnyttelse af de levende ressourcer i færøske vandløb og søer. Loven omfatter ikke udnyttelse af hvaler, sæler, fugle og opdrætsfisk."

2) § 5, stk. 3 affattes således:
"**Stk. 3.** **Fangsttilladelse** i henhold til denne lov er den godkendelse, som Færøernes landsstyre tildeler et bestemt fiskefartøj til fangst på det færøske fiskeriterritorium og i havområder udenfor det færøske fiskeriterritorium."

3) § 5, stk. 9 affattes således:
"**Stk. 9.** **Stovnsrøktarnevndin.** Landsstyret vælger "stovnsrøktarnevnd". Fiskeriforeningerne, der repræsenterer trawl- og krogfiskeri har hver to medlemmer og suppleanter for disse i "stovnsrøktarnevnd",

nevndarinnar og tryggjar nevndini kunnleika til tey tilmæli, ið Fiskirannsóknarstovan letur landsstýrinum. Fiskirannsóknarstovan tilnevnir skrivara í stovnsrøktarnevnina."

4) § 9, stk. 1, nr. 7 verður orðað soleiðis:
"Hvussu mótroknað verður, um veitt verður út um kvotuna og um hvussu virðið í mótrokningini verður at nýta."

5) § 10, stk. 5 og stk. 6 verða orðað soleiðis:
"**Stk. 5.** Á landleiðunum og í føroyskum havnum er tað bannað fiskiførum, sum eru undir fremmandum flaggi og fremmandum ríkisborgarum at reka vinnuligan fiskiskap yvirhøvur, herundir fáast við slíkt, ið stendur í samband við fiskiskap, so sum umskiping av fongi, virking, pakking ella onnur handfaring av fiski ella fiskavøru, umskiping av útgerð ella ankring við tí í hyggju at taka lut í umskiping av fiski ella taka inn útgerð.
Stk. 6. Landsstýrinum er heimilað at gera undantak frá forboðnum í stk. 1 og stk. 5. og heimilað at gera nærri reglur hesum viðvíkjandi."

6) í § 10 verður sum nýtt stk. 7 sett:
"**Stk. 7.** Eisini er bannað fiskiførum, sum eru undir fremmandum flaggi og fremmandum ríkisborgarum, at koma á føroyskt sjóøki ella í føroyska havn uttan í skaðalaysari gjøgnumsigling, um so er, at tey hava brotið reglur fyri fiskiskapi uttan fyri føroysku landleiðirnar, sum fiskifør undir føroyskum flaggi sambært millumlanda avtalur eru bundin at halda."

7) § 13 verður orðað soleiðis:
"**§ 13.** Eingin kann ráða yvir meira enn 10% av hvørjari heildarkvotu á føroysku landleiðunum."

8) § 15, stk. 1. verður orðað soleiðis:

som afgiver indstilling til landsstyret om højst tilladte fangst. Udvalget vælges for fire år ad gangen. Landsstyret udfærdiger regler vedrørende valg af udvalget og dets virksomhed og drager omsorg for, at udvalget er informeret om indholdet i de indstillinger Færøernes Fiskeriundersøgelser tilstiller landsstyret. Færøernes Fiskeriundersøgelser udpeger sekretæren for udvalget."

4) § 9, stk. 1, nr. 7 affattes således:
"Hvorledes modregning skal ske, såfremt der fiskes udover den tildelte kvote, og hvordan provenuet i modregningen skal anvendes."

5) § 10, stk. 5 og 6 affattes således:
"**Stk. 5.** Det er forbudt fiskeskibe under fremmed flag og fremmede statsborgere, på fiskeriterritoriet og i færøsk havn at udføre erhvervsmæssigt fiskeri, herunder at foretage sig noget, der har forbindelse med fiskeri, såsom omladning af fangst, forarbejdning og pakning af fangst eller anden håndtering af fisk eller fiskeprodukter, omladning af udrustning eller opankring med den hensigt at deltage i omladning af fisk eller ombordtagning af udrustning.
Stk. 6. Landsstyret er bemyndiget til at dispensere fra forbudet i stk. 1 og stk. 5 og at udfærdige nærmere regler herfor."

6) I § 10 indsættes som nyt stk. 7:
"**Stk. 7.** Det er ligeledes forbudt fiskefartøjer under fremmed flag og fremmede statsborgere at komme ind på færøsk søterritorium eller i færøsk havn, undtagen i skadesløs gennemsejling, hvis de har overtrådt regler for fiskeri udenfor færøsk fiskeriterritorium, som fiskefartøjer under færøsk flag i henhold til internationale aftaler er forpligtede til at overholde."

7) § 13 affattes således:

"Egin kvotupartur kann verða latin ella útleigaður øðrum, um teir líka treytirnar í lógini annars, við teimum avmarkingum, sum ásettar eru í stk. 2 og § 16. Landsstýrið skal hava frá-boðan um flyting av kvotu, áðrenn farið verður at fiska flutu ella leigaðu kvotuna. Kvotuparturin kann ikki verða settur í veð."

9) § 16 verður orðað soleiðis:

"**§ 16.** Landsstýrið ásetir reglur um, á hvønn hátt kvotur kunnu verða leigaðar, lætnar og fluttar millum bólkar av fiskiførum og veiðihættum."

Stk. 2. Egnir kvotupartar, sum eru grundaðir á veiðu við útróðrarbáti, kunnu bert verða latnir ella leigaðir øðrum útróðrarbátum."

10) § 18 verður orðað soleiðis:

"**§ 18.** Fiskiskapur skal steðga beinanvegin, tá ið egna árskvotan, felagsárskvotan ella hjáveiðukvotan av ávísum fiskasløgum er uppfiskað, sbr. tó stk. 3.

Stk. 2. Fiskiloyvi ella partar av fiskiloyvi detta burtur av sær sjálvum, tá ið kvotan er uppfiskað.

Stk. 3. Um veiðan eftir einum ávísum fiskaslagi ger, at fiskiskapurin eftir øðrum fiskasløgum steðgar, kann landsstýrið í kunngerð áseta reglur fyri, hvussu fiskiskapurin eftir teimum fiskasløgum, sum ikki eru uppfiskað, verður at halda áfram."

11) § 19 verður orðað soleiðis:

"**§ 19.** Landsstýrið kann gera av, at veiðinøgdir av ávísum fiskasløgum skulu hækkast við ávísum prosentparti, tá roknað verður, hvussu nógv av egnu árskvotuni ella felagsárskvotuni er nýtt, um fiskurin ikki gongur gjøgnum føroysku innvigingarskipanina, tó fyri tosk og hýsu upp til 20% og fyri upsa og kongafisk upp til 15%. Óvirkaður fiskur er ósløgdur, sløgdur ella avhøvdaður fiskur, sama

"**§ 13.** Ingen kan råde over mere end 10% af hver enkelt totalkvote gældende på færøsk fiskeriterritorium."

8) § 15, stk. 1 affattes således:

"Individuel kvoteandel kan overføres eller udlejes til andre, såfremt disse opfylder lovens betingelser iøvrigt, med de begrænsninger, der er fastsat i stk. 2 og § 16. Overførsel af kvoter skal meddeles landsstyret, inden der påbegyndes fiskeriefter overført eller udlejet kvote. Kvoteandelen kan ikke pantsættes."

9) § 16 affattes således:

"**§ 16.** Landsstyret udfærdiger regler om, på hvilken måde kvoter udlejes, tildeles og overføres mellem grupper af fiskefartøjer og fangstmåder."

Stk. 2. Individuelle kvoteandele, som er tildelt til fiskeri med kystfiskefartøj, kan kun overføres eller udlejes til andre kystfiskefartøjer."

10) § 18 affattes således:

"**§ 18.** Fiskeriet skal ophøre øjeblikkelig, når den individuelle årskvote, den fælles årskvote eller bifangstkvoten for bestemte fiskearter er opfisket, jfr. dog reglerne i stk. 3.

Stk. 2. Fiskeritilladelsen eller dele heraf bortfalder automatisk, når kvoten er opfisket.

Stk. 3. Hvis fangst af en bestemt fiskeart afstedkommer, at fiskeriet af andre fiskearter må ophøre, kan landsstyret i bekendtgørelse fastsætte regler for, hvorledes fiskeriet af de fiskearter, der ikke er opfiskede, kan fortsætte."

11) § 19 affattes således:

"**§ 19.** Landsstyret kan bestemme, at fangstmængder af bestemte fiskearter skal forhøjes med en vis procentdel ved beregning af hvor stor en del af individuel eller fælles årskvote, der er fanget, hvis fisken ikke indvejes på Færøerne; for torsk og kuller med op

hvussu hann er goymdur."

12) Yvirskriftin í kapittul 7 verður broytt soleiðis:

"Kapittul 7
Ymiskar ásetingar"

13) § 27 verður til orðað soleiðis:

"**§ 27.** Heildarkvotur á landleiðunum fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verða ásettar fyri hesar fiskastovnar frá 1. september 1994 til 31. august 1995

Tons rund vekt:

Toskur á Føroya Banka	1.000
Toskur á landgrunninum	8.500
Hýsa	6.000
Upsi	41.500
Kongafiskur	13.300

Stk. 2. Aftrat heildarkvotum sambært stk. 1. kunnu verða ásettar hjáveiðukvotur fyri fiskifør undir føroyskum flaggi fyri hesar fiskastovnar frá 1. september 1994 til 31. august 1995

Tons rund vekt:

Toskur á Føroya Banka	00
Toskur á landgrunninum	00
Hýsa	00
Upsi	00
Kongafiskur	00

Stk. 3. Hjáveiðukvota kann veitast fiskiførum ella bólkum av fiskiførum, sum í veiðu eftir fiskasløgum undir kvotu, ikki sleppa undan hjáveiðu, sum fer út um egnu kvotu ella felagskvotu."

14) § 28 verður orðað soleiðis:

"**§ 28.** Felags kvotupartar verða ásettir fyri hesar bólkar av fiskiførum á føroysku landleiðunum:

Bólkur 1: Ståltrolarar yvir 400 HK, lemmatrolarar.

Bólkur 2: Ståltrolarar yvir 400 HK, pør.

Bólkur 3: Stállínuskip yvir 110 BRT

Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 20 BRT á húkaveiðu

Bólkur 5: Trolbátar undir 55 BRT.

til 20% og for sej og rødfisk med op til 15%. Uforarbejdet fisk er urenset, renset eller hovedkappet fisk, uanset hvilken opbevaringsmåde, der anvendes."

12) Overskriften i kapitel 7 ændres til:

"Kapitel 7
Diverse bestemmelser"

13) § 27 affattes således:

"**§ 27.** Totalkvoter på fiskeriterritoriet for fiskefartøjer under færøsk flag fastsættes for nedennævnte fiskebestande for tidsrummet 1. september 1994 til 31. august 1995:

Tons rund vægt:

Torsk på Føroya Banka	1.000
Torsk på landsokkelen	8.500
Kuller	6.000
Sej	41.500
Rødfisk	13.300.

Stk. 2. Udover totalkvoterne, som nævnt i stk. 1, kan bifangstkvoter fastsættes for fiskefartøjer under færøsk flag for nedennævnte fiskebestande fra 1. september 1994 til 31. august 1995:

Tons rund vægt:

Torsk på Føroya Banka	00
Torsk på landsokkelen	00
Kuller	00
Sej	00
Rødfisk	00.

Stk. 3. Bifangstkvote kan tildeles fiskefartøjer eller grupper af fiskefartøjer, som ved fiskeri af kvoterede fiskearter er ude af stand til at undgå bifangst, der overskrider individuel eller fælles kvote."

14) § 28 affattes således:

"**§ 28.** Fælleskvoteandele fastsættes for følgende fiskefartøjsgrupper på fiskeriterritoriet:

Gruppe 1: Ståltrawlere over 400 HK, skovltrawlere.

Gruppe 2: Ståltrawlere over 400 HK, par.

Bólkur 6: Útróðrarbátar undir 20 BRT á húkaveiðu
Bólkur 7. Onnur veiða.

Stk. 2. Felags kvotupartarnir verða roknaðir hvørjum bólki sær eftir prosentbýti av teimum ymisku fiskastovnunum soleiðis:

Gruppe 3: Stållinebåde over 110 BRT.
Gruppe 4: Kystfiskefartøjer over 20 BRT, krogfiskeri.
Gruppe 5: Trawlfartøjer under 55 BRT.
Gruppe 6: Kystfiskefartøjer under 20 BRT, krogfiskeri.
Gruppe 7: Fiskeri iøvrigt.

Stk. 2. Fælles kvotandele beregnes for hver enkelt gruppe i procent af de forskellige fiskebestande på følgende måde:

	Toskur Torsk	Hýsa Kuller	Upsi Sej	Konga fiskur Rødfisk
Bólkur 1: Trol, lemmatrolarar Gruppe 1: Trawl, dørtrawlere	4%	1,75%	13%	88,5%
Bólkur 2: Trol, pør Gruppe 2: Trawl, par	21%	10,25%	68%	8,5%
Bólkur 3: Línuskip Gruppe 3: Lineskibe	23%	28%		1%
Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 20 BRT, húkaveiða Gruppe 4: Kystfiskefartøjer over 20 BRT, krogfiskeri	14%	21%	10%	1%
Bólkur 5: Trolbátar undir 55 BRT Gruppe 5: Trawlfartøjer under 55 BRT	13%	7%	2%	1%
Bólkur 6: Útróðrarbátar undir 20 BRT, húkaveiða Gruppe 6: Kystfiskefartøjer under 20 BRT, krogfiskeri	24%	30%	7%	
Bólkur 7: Onnur Gruppe 7: Andre	1%	2	2%	1%

15) § 29 verður orðað soleiðis:

"**§ 29.** Innan fyri hvønn av bólkunum av fiskiførum í § 28, stk. 1, verður egni kvotuparturin hjá skipi roknaður soleiðis:

1) Bólkur 1 verður skipaður í tríggjar undirbólkar soleiðis:
   A: Djúpvatns lemmatrolarar y. 400 BRT, 2100 HK ella meira.
   B: Djúp- og meðalvatnslemmatrolarar u. 400 BRT, 1200 HK ella meira.
   C: Lemmatrolarar u. 400 BRT, minni enn 1200 HK.
   Í bólki A verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
   Toskur 0,27%, hýsa 0,12%, upsi 0,60%, kongafiskur 8,27%.
   Í bólki B verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
   Toskur 0,27%, hýsa 0,12%, upsi 1,20%, kongafiskur 4,14%.
   Í bólki C verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
   Toskur 0,27%, hýsa 0,12%, upsi 1,20%, kongafiskur 1,88%.
2) Bólkur 2 verður skipaður í tríggjar undirbólkar:
   A: Partrolarar størri enn 220 BRT, 1150 HK ella meira, byggiár 1984 ella seinni.
   B: Partrolarar y. 200 BRT, 700 HK ella meira.
   C: Partrolarar u. 200 BRT, minni enn 700 Hk.
   Í bólki A verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
   Toskur 0,57%, hýsa 0,28%, upsi 2,50%, kongafiskur 0,25%.
   Í bólki B verður tillutað hvørjum skipi av MLV:
   Toskur 0,57%, hýsa 0,28%, upsi 1,90%, kongafiskur 0,22%.
   Í bólki C verður tillutað hvørjum skipi av MLV:

15) § 29 affattes således:

"**§ 29.** Inden for hver af grupperne af fiskefartøjer i § 28, stk. 1, beregnes fartøjets individuelle kvoteandel således:

1) Gruppe 1 opdeles i tre undergrupper således:
   A: Dybvands dørtrawlere o. 400 BRT, 2100 HK eller mere.
   B: Dyb- og mellemvandsdørtrawlere u. 400 BRT, 1200 HK eller mere.
   C: Dørtrawlere u. 400 BRT, mindre end 1200 HK.
   I gruppe A tildeles hvert skib af HTF: Torsk 0,27%, kuller 0,12%, sej 0,60%, rødfisk 8,27%.
   I gruppe B tildeles hvert skib af HTF: Torsk 0,27%, kuller 0,12%, sej 1,20%, rødfisk 4,14%.
   I gruppe C tildeles hvert skib af HTF: Torsk 0,27%, kuller 0,12%, sej 1,20%, rødfisk 1,8%.
2) Gruppe 2 opdeles i tre undergrupper:
   A: Partrawlere større end 220 BRT, 1150 HK, byggeär 1984 eller senere.
   B: Partrawlere o. 200 BRT, 700 Hk eller mere.
   C: Partrawlere u. 200 BRT, mindre end 700 HK.
   I gruppe A tildeles hvert skip af HTF: Torsk 0,57%, kuller 0,28%, sej 2,50%, rødfisk 0,25%.
   I gruppe B tildeles hvert skip af HTF: Torsk 0,57%, kuller 0,28%, sej 1,90%, rødfisk 0,22%.
   I gruppe C tildeles hvert skib af HTF: Torsk 0,57%, kuller 0,28%, sej 1,29%, rødfisk 0,20%.
3) Gruppe 3: Der fordeles ligeligt mellem fartøjerne i gruppen.
4) Gruppe 4 fisker af fælles årskvote.
5) Gruppe 5: Der fordeles ligeligt

Toskur 0,57%, hýsa 0,28%, upsi 1,29%, kongafiskur 0,20%.

3) Bólkur 3: Býtt verður javnt ímillum skipini í bólkinum.
4) Bólkur 4 fiskar av felags árskvotu.
5) Bólkur 5: Býtt verður javnt millum skipini í bólkinum. Um trolbátur leggur um aftur frá troli til línu-/snelluveiðu, fellur hansara partur inn í bólk 4.
6) Bólkur 6 fiskar av felags árskvotu.
7) Fiskitíðin fyri bátar, ið fiska av felagskvotu, verður býtt í trý tíðarskeið:
   1: september - desember
   2: januar - april
   3: mai - august.

Stk. 2. Í fyrsta kvotubýti umfari verður ikki kvota ella kvotapartur tillutaður fiskifari, sum ikki er í vinnu ella møguliga ikki fer í vinnu fyribils. Er vissa fyri, at farið kemur í vinnu rímiligan part av fyrsta fiskiári útskrivar landsstýrið kvotubræv. Kvota ella partar av kvotu soleiðis ónýttur fellur til hini førini í avvarandi høvuðsbólki. Henda regla ávirkar ikki frí u umsetiligheitina smb. § 16 annars, tá kvotubræv endaliga er útskrivað.

Stk. 3. Landsstýrinum verður heimilað, tá fýra mánaðir eru eftir av fiskiárinum, at flyta ónýttar kvotur, til annan bólk, sum tørvar hesa kvotu, grundað á tilætlingina í hesi lóg."

16) § 42 verður orðað soleiðis:
"**§ 42.** Brot móti reglunum í kapitli 2. tá ið tað snýr seg um ólógligan fiskiskap og um at fáast við slíkt, ið stendur í sambandi við fiskiskap, koma undir bót sambært § 40. Í teimum førum, brotini snúgva seg um ólógligan fiskiskap við ólógligum reiðskapi, kemur haraftrat allur fiskireiðskapur so sum net, lemmar, veirar, línur, uppstandarar v.m. og fongur undir

mellem fartøjerne i gruppen. Såfremt et trawlfartøj, permanent, lægger om fra trawl til line-/snellefangst, falder dennes andel tilbage i gruppe 4.

6) Gruppe 6 fisker af fælles årskvote.
7) Fiskeriden for både, der fisker af fælleskvote, deles op i tre perioder:
   1: september - december
   2: januar - april
   3: maj - august.

Stk. 2. I den første kvotefordeling tildeles ikke kvote eller kvoteandel til fiskefartøj, der ikke er i drift eller muligvis ikke foreløbigt påbegynder drift. Er der sikkerhed for, at fartøjet kommer i drift i en rimelig del af det første fiskeriår, udskriver landsstyret kvotebrev. Kvote eller dele af kvote, der således er uudnyttede, tilfalder de andre fartøjer i vedkommende hovedgruppe. Denne bestemmelse påvirker ikke den frie omsættelighed iøvrigt i henhold til § 16, når kvotebrev udskrives endeligt.

Stk. 3. Landsstyret bemyndiges til, når der resterer fire måneder af fiskeriåret, at overføre uudnyttede kvoter til andre grupper, der har behov for denne kvote, baseret på principperne i denne lov."

16) § 42 affattes således:
"§ **42.** Overtrædelse af reglerne i kapitel 2, vedrørende ulovligt fiskeri og virksomhed, der er accessorisk handling til fiskeri, straffes med bøde i henhold til § 40. Såfremt overtrædelserne omfatter fiskeri med ulovlige redskaber, konfiskeres desuden alle fiskeredskaber, herunder net, lemme, slæbetrosser, liner, opstandere m.m. og fangst. Skibet kan ligeledes beslaglægges til dækning af bøde og omkostninger.

Stk. 2. Sager vedrørende overtrædelse

inndrátt. Skipið kann eisini haldast aftur til rindingar av bót og kostnaði.

Stk. 2. Mál, sum viðvíkja brotum á lógina ella reglum ásettar við heimild í lógini, kunnu verða avgjørd av løgregluni eins væl og av skiparanum á avvarðandi fiskiveiðieftirlitsskipi, í samráð við fútan, um bót, inndráttur og gjald av sakarmálskostnaði verða góðtikin.

Stk. 3. Málið verður ikki avgreitt eftir stk. 2, verður málið lagt fyri dómsvaldið. Upplýst eigur at verða um rættin til at leggja málið fyri dómsvaldið og hvør freistin er. Áheitan um at fáa málið lagt fyri dómsvaldið skal boðast fútanum frá í seinasta lagi 1 viku eftir, at avgerðin er boðað viðkomandi.

Stk. 4. Viðvíkjandi góðtøku eftir stk. 2 verður reglan í rættargangslógini um innihald í ákæruriti í løgreglumálum at nýta í hesum sambandi."

17) Í § 45, 3. reglu verður orðingin "nr. 8" strikað.

af loven eller regler udfærdigede med hjemmel i loven, kan afgøres af såvel politiet som af føreren af vedkommende fiskeriinspektionsskib i samråd med landfogeden, ved vedtagelse af bøde, konfiskation og sagsomkostninger.

Stk. 3. Afgøres sagen ikke i henhold til stk. 2, indbringes den for domstolene. Der bør oplyses om muligheden for at forelægge sagen for domstolene og om fristen for forelæggelse. Begæring om forelæggelse for domstolene skal meddeles politimesteren senest 1 uge efter at afgørelsen er meddelt vedkommende.

Stk. 4. Med hensyn til den i stk. 2 nævnte vedtagelse, finder bestemmelserne i retsplejeloven om indhold i anklageskrifter i politisager tilsvarende anvendelse."

17) I § 45, 3. linie slettes ordene "nr. 8".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Tó fáa broytingarnar nr. 14 og 15 ikki gildi fyrr enn frá 1. september 1995.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort. Dog træder ændringerne nr. 14 og 15 ikki i kraft før 1. september 1995.

Viðmerkingar:

Landsstýrið legði uppskot fram um vinnuligan fiskiskap beint fyri jól í løgtingsmáli nr. 51 dagsett hin 18. desember 1993.

Løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap kom í gildi hin 17. mars 1994. Henda lóg ásetti kvotur fyri tíðarskeiðið 1. mars - 31. august 1994. Kvoturnar í lógini um vinnuligan fiskiskap vóru ásettar grundað á tilmæli frá fiskifrøðingum. Sakliga grundarlagið fyri tølunum fyri tosk og hýsu er ein 5 ára ætlan fyri at byggja upp aftur toska- og hýsustovnarnar. Í 5 ár er neyðugt at áseta so lágar kvotur sum møguligt fyri tosk og hýsu fyri skjótast gjørligt at byggja stovnarnar upp aftur. Fiskifrøðingarnar hava gjørt vart við, at gýtingarstovnarnir av toski og hýsu eru lægri enn nakran tíð fyrr,

og kundi hetta hava avleiðingar fyri, hvussu nógv kom undan á hvørjum ári. Teir eiga tí skjótast gjørligt at verða bygdir upp til eitt støði, sum vit frá søguligum royndum vita, hevur givið góða gýting. Fyri upsa er skotið upp at fiska heldur omanfyri tað, sum vanliga verður roknað hitt besta lívfrøðiliga og sum fiskifrøðingar mæla til, tí hesin stovnur var rímiliga væl fyri. Fyri longu, brosmu, blálongu og kongafisk varð skotið upp at fastleggja kvoturnar í 5 ár á miðaltalinum í veiðuni 1988 -1992.

Í august 1994 ásetti løgtingið kvotur fyri fiskiárið 1. september 1994 til 31. august 1995. Í hesum sambandi hækkaði løgtingið kvotuna fyri tosk á landgrunninum 25% og lækkaði toskakvotuna á Føroya Banka við 29% roknað fyri eitt heilt ár. Við øðrum orðum gjørdi løgtingið fyri tosk á landgrunninum eitt frávik frá ætlanina um at lata allan vøkstur og tilgongd koma stovninum til góðar. Stovnsmetingar hjá Fiskirannsóknarstovuni í november 1994 vísa, at stovnsmetingin av toski er heldur bjartari enn hon í mai, men hóast bæði betri vøkstur og at onkur árgangur er hægri mettur, so stendur grundsjónarmiðið við. Gýtingarstovnurin liggur niðan fyri tað, vit fyrr hava sað í stovnsmetingunum. Viðvíkjandi hýsuni bendir alt á, at tveir árgangir, sum eru væl oman fyri tað støði, vit hava sað seinastu 15 árini fyri hýsu, eru á veg inn í stovnin. Hetta er orsøkin til, at neyðugt hevur verið at gevast við ídnaðarveiðuni undir Føroyum. Nógv bendir á, at tað nógva ætið, sum hevur verið at sað, fær fiskin at taka seg betri saman og sostatt økist veiðan upp á veiðuorkuna meira enn stovnurin er vaksin.

§ 2, stk. 4 nevndin, sum skal ráðgeva landsstýrinum í spurningum um, um lógin um vinnuligan fiskiskap livur upp til síni endamál, gjørdi tilmæli til landsstýrið um broytingar í lógini 21. juli. 1994.

Høvuðssjónarmiðini í frágreiðingini eru, at skipanin er ov stirvin, sum er. Hon forðar fyri at flotin lagar seg til tær nýggju umstøðurnar, eftir at kilostudningar o.a er burtur og aðrir studningar eru tíðaravmarkaðir. Teir ráða tó ikki til púra fría umsetiligheit fyri óavmarkaða tíð beinanveg, tí umstøðurnar eru ikki til tað. Hinvegin mæla teir ítøkiliga til:

1. Øll heildarkvotan verður lutað út sum egnar kvotur, tó fiskifør undir 20 BRT undantikin, og at kvoturnar kunnu umsetast í minsta lagi tvey ár í senn og uttan avmarkingar við atliti at fiskihátti.
2. Felagskvotan hjá útróðrarbátum undir 20 BRT verður býtt sundur millum húk og trol.
3. Umsetningurin av fiskikvotum eigur at verða samskipaður, so allir partar av flotanum hava somu møguleikar at bjóða seg fram.
4. Loyvt verður at virka ein part av veiðuni umborð.

Frágreiðingin frá § 2. stk. 4 nevndini er løgd hjá.

Um ymsar hættir at stýra fiskiskapi.

Tá talan er um beinleiðis veiðu eftir toski og hýsu, eru fastar kvotur eitt 5 ára skeið ikki truplari at umsita enn aðrar skipanir, sum avmarka veiðimøguleikarnar hjá fiskiflotanum. Tá talan er um hjáveiðu, kunnu í vaksandi stovnum trupulleikar standast av hesari í veiðu eftir øðrum stovnum. Serstakliga hevur verið tosað um hjáveiðuna av toski og

hýsa í upsaveiðini.

Landsstýrið hevur ta ætlan at royna at finna eina aðra skipan enn kvotaskipanina fyri stýring av fiskiskapi, sum tryggjar at fiskivinnan er bæði lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygg.
Landsstýrinum er greitt, at neyðugt er at avmarka veiðuna eftir toski og býsu eitt áramál við núverandi flota, sum hevur kvotu av hesum sløgum. Eisini er neyðugt at seta mark fyri, hvussu nógv verður veitt av øðrum stovnum. Fiskirannsóknarstovan og ICES lata á hvørjum ári landsstýrinum tilfar hesum viðvíkjandi. Tað er tí greitt, at eingin skipan kvotu- ella onnur, loyvir fríum fiskiskapi, onkursvegna má avmarkast fyri at verja stovnarnar. Skulu avmarkingar vera, t.e. skal veiðan eftir toski og hýsu avmarkast til eitt ávíst MLV, so kann hetta í prinsippum gerast annaðhvørt við at seta kvotur á veiðuna, sum verður tikið úr sjónum, ella við at seta kvotur (ella aðrar avmarkingar) á veiðiorkuna, við øðrum orðum forða fiskiflotanum at nýta sínar fullu møguleikar.

Veiðukvotur.
Verða kvotur hildnar fyri hvørt fiskaslag sær, so er stovnurin vardur og tað ber til at tryggja, at ikki meira verður tikið burtur úr, enn stovnurin tolir. Á tann hátt ber til at tryggja, at fiskiveiðan verður meira jøvn millum ár, at vit drýggja tilfeingið, so at tær broytingar, sum alla tíðina verða í náttúruni, ikki sláa fult ígjøgnum í veiðuni.

Er MLV ásett er eingin ivi um, at vinnan undir hesum treytum biður um egnar kvotur. Tey einstøku fiskiførini og reiðaríini vilja vita, hvussu nógv tey hava at ráða yvir og leggja sær til rættis, nær hesi tonsini skulu fiskast. Felagskvotur føra til kapping um rúgvu og ger tað torført at leggja nakra fiskiætlan fyri árið.

Búskaparfrøðingar eru á einum máli um, at fyri at tryggja besta búskaparliga úrslitið av fiskivinnuni, serliga at tilfeingisrentan kemur til sættis og ikki hvørvur í vantandi effektiviteti og ov nógvari veiðiorku, er ein skipan við umsetiligum kvotum hin dyggasta. Fortreytin fyri tí er tó, at allir partar í fiskivinnuni virka undir marknaðarbúskaparligum treytum. Eitt dømi eigur at verða nevnt. Um kvoturnar skulu vera frítt umsetiligar, verður tað avgerandi fyri, hvør kann keypa sær kvotur, hvussu inntøkurnar hjá viðkomandi bólki eru. Hetta avgera nøgd og prísur. Verður størsti dentur lagdur á nøgd, vinnur ein bólkur, verður størsti dentur lagdur á dygd, vinnur ein annar. Tí eru avreiðingarprísir og yvirhøvur skipanin fyri, hvussu fiskur verður seldur, avgerandi. Higartil hevur virkisliðið lagt stóran dent á nøgd, og prísurin í Føroyum hevur mest verið fyri heilar lastir. Hetta hevur gjørt, at teir skipabólkar, sum kunna landa stórar nøgdir regluliga, hava havt munin, meðan útróðrarflotin, sum skuldi havt bestu fyritreytir fyri at latið dygdargóðan fisk, ikki hevur havt góðar møguleikar at klára seg í kappingini um kvoturnar.

Størstu trupulleikarnir við veiðikvotum eru møguleikarnir fyri, at veiða ikki verður uppgivin, ella at bert partur av veiðuni verður tikin inn. (útblaking). Við einum dyggum fiskiveiðieftirliti (landeftirliti) og teirri innvigingarskipan, sum landsstýrið hevur sett í verk (sjálvseftirlit við staksýniseftirliti frá tí almenna) og eini effektivisering (umprioritering) av eftirlitinum á sjónum, er hetta tó ikki ein praktiskur, men meira ein skipanar-

ligur spurningur.

Veiðuorkukvotur ella avmarkingar í rættinum at nýta veiðiorkuna.
Veiðuorkan kann kvoterast upp á ymiskar mátar. 1) Talið av fiskiførum verður avmarkað. 2) Fiskidagatal verður ásett fyri fiskiflotan. 3) Veiðiøkini hjá fiskiflotanum verða avmarkað.
4) Veiðuorkan hjá reiðskapinum verður avmarkað (meskavídd og reiðskapslongd).

Fiskidagakvotur.
Tað er rættuliga einfalt at rokna veiðukvotur um til veiðiorkukvotur t.d. fiskidagar, troltímar, setur ella annað líknandi, um bert verður fiskað eftir einum fiskaslagi. Verður fiskað eftir fleiri fiskasløgum, verður hetta meira trupult, men einki er í vegin fyri at hava fiskidagakvotu eftir einum fiskaslagi og so áseta hjáveiðuprosent av øðrum fiskasløgum. Royndir aðrastaðni við hesum vísa tó, at tað er ógvuliga torført at meta um, hvussu nógv veiðuorkan verður effektivari ár undan ári, so at regluliga má samsvarið millum t.d. fiskidagatal og ta veiði, stovnurin tolir, roknast út av nýggjum. Royndirnar aðrastaðni sýna, eitt nú í Íslandi, at fiskidagatalið, hvørt skip hevur at ráða yvir, minkar. Tí eru flestu lond, sum hava royni hetta, farin burtur frá fiskidagakvotum.

Kvotur fyri fiskifør.
Ein annar háttur at avmarka veiðiorkuna er at seta kvotur á talið av skipum í hvørjum bólki av fiskiførum. Ein háttur at gera hetta er at rokna seg fram til, hvussu nógv avreiðingarnar geva av sær og síðani rokna út, hvussu nógvur íløgukapitalur kann rentast út frá tí. Kvotan av hvørjum skipaslag verður so eftir, hvørji skipasløg vera nýtt og hvussu stórar fløgur krevjast í hesi.

Sambandið veiða og tal av fiskiførum má roknast út fyri hvønn skipabólk sær og fyri heildina. Uttan at gera eitt nágreiniligt roknistykki, ber tó til at siga, at fiskiflotin, sum í dag roynir eftir kvoteraðum fiskasløgum, má skerjast munandi, eisini um toska- og hýsustovnurin koma fyri seg aftur.

Økis- og aðrar avmarkingar.
Økisavmarkingar eru eisini eitt slag av veiðuorkukvotum, men ikki ber til so neyvt at rokna út sambandið millum stongdar leiðir, veiðiorku og veiði. Tað ber til at siga, at skulu stongdar leiðir koma í staðin fyri kvotur, tá talan er um tosk, so mugu nógv víðari leiðir enn í dag steingjast fyri øllum reiðskapi. Fyri hýsu er uppaftur truplari, tí smáhýsan er um allan landgrunnin og er torfør at verja við stongdum leiðum.

Á sama borð bera reiðskapsavmarkingar t.d. meskavíddir. Trupulleikin her er, at skal t.d passaliga veiðast av upsa, so verður ov nógv veitt av toski og hýsu. Verður meskavíddin so útroknað eftir toskinum og hýsuni, missur flotin stóran part av upsanum. Somu trupulleikar eru í aðrari veiðu. Meskavíddir hóska best, tá eitt fiskaslag hevur avgerandi týdning.

Samandráttur

Samanumtikið eru veiðikvotur neyvasta stýringstól, vit hava. Hinar skipanirnar eru ikki so neyvar og eru ringar at nýta, tá fiskiskapurin er blandaður. Landsstýrið dugur tí ikki í løtuni at síggja annan møguleika enn at tryggja, at rætt verður fiskað úr hvørjum stovni við at áseta MLV og heildarkvotur. Er hendan avgerð tikin, fylgir tað av sær sjálvum, at neyðugt er so vítt sum gjørligt at áseta egnar kvotur. Undir hesum umstøðum eru vinnan og § 2 nevndin samd um, at tá eigur so stór umsetiligheit sum gjørligt at vera í kvotunum.

Meðan vit bíða eftir eini tillaging til nýggju umstøðurnar í virkis- og søluliði, er landsstýrið tó samt við § 2 nevndina at ikki er rætt at hava ov stóra umsetiligheit millum útróðrarflotan og tey størri skipini.

Út frá hesum meginsjónarmiðum leggur landsstýrið uppskot til broytingar í lóg um vinnuligan fiskiskap fyri løgtingið. Tær broytingar, sum ikki fylgja av hesum, eru rættingar í samband við spurningar, sum hava stungið seg upp í samband við umsitingini av lógini millum annað. Hetta verður lýst í viðmerkingunum til tær einstaku greinirnar niðanfyri.

Høvuðsbroytingarnar eru tær, sum eisini eru í felagsyvirlýstingini frá landsstýrinum og donsku stjórnini frá 17. november 1994. Møguleikar fyri at áseta reglur, sum tryggja, at t.d. upsafiskiskapurin ikki steðgar upp, hóast toskakvotan er uppi, og størri umsetiligheit millum útróðrarbátar yvir 20 tons og millum fiskifør yvir 100 BRT.

Viðmerkingar til einstøku broytingarnar:

ad. 1). Broytingin er, at lógin eisini fevnir um at gagnnýta livandi tilfeingið í áum og vøtnum og í samsvar við § 9, stk. 3. Frá tí, at fiskarílógin frá 1896 fór úr gildi, hevur løgtingslóg nr. 77 frá 12. juni 1990 um fiskiskapin á innaru landleiðini verið galdandi, men fór úr gildi við hesi lóg.

ad. 2). Skipanin við veiði- og fiskiloyvum ger, at tað er ikki neyðugt at endurnýggja veiðiloyvi hvørt ár, meðan fiskiloyvi fylgir fiskiárinum og verður endurnýggjað.

ad. 3). Víst verður til, at samsvar er ikki við viðmerkingarnar hjá løgtinginum, tá lógin var til viðgerðar í fjør vár, og verandi lógartekst. Landsstýrið eigur tí at gera reglugerð um val og virki nevndarinnar, tí fyriskipanin av valinum er ásett í lógini.

ad. 4). Løgtingsins fiskivinnunevnd hevur mælt til, at veiðifar og manning skulu fyri veiðu, sum er veidd útum kvotu, hava 5 % undir galdandi upsapris í meðal seinasta ársfjórðing á teimum av landsstýrinum góðkendu uppboðssølunum í Føroyum.

Sum ein útrokningarregla verður henda regla sett í kunngerð, meðan restin av virðinum fer í landskassan, tí tað er í lógini ikki ásett, hvussu inndráttur av veiðivirði skal hýtast.

ad. 5). Fyri at einki ivamál skal verða um innara landleiðin eisini fevnir um havnir, verða hesar nú nevndar í lógini. Hjá útlendskum fiskiførum eru allar "accessoriskar"

atgerðir bannaðar og tí verður landsstýrinum heimilað at gera undantøk og tá áseta nærri reglur. Hetta hevur m.a. verið gjørt, tá russisk skip hava umskipað í Føroyum og kann tí hava týdning fyri at skapa økt virksemi í landinum.

ad. 6). Landsstýrið heldur, at hesar reglur hava so álvarsligan týdning fyri samvinnuna við tey lond, sum Føroyar hava fiskiveiðiavtalu við, og fyri at tryggja føroyskum fiskiførum skipað trygg varandi veiðiviðurskifti komandi, soleiðis sum fiskivinnusamstarvið við onnur lond hevur verið seinastu 15 árini. Flestu fiskivinnutjóðir hava slíkar reglur, sum eru í tráð við samtyktir á UNCED stevnuni í RIO í 1992 um burðardygt at gagnnýta tilfeingið í havinum og fyribils uppskotinum til altjóðakonvensjón um útflagging og ST- yvirlýsing um skipan fyri fiskiveiðu á víðum havi og eftir stovnum, sum ferðast um fiskimørk. Haraftrat hava hesar reglur alstóran týdning fyri føroysku veiðuna í altjóða sjógvi (Irmingarhavinum og Hatton Bank) og um norðhavssildin kemur aftur.

ad. 7.) Broytingin í § 13 er fyri at gera verandi orðing meira týðuliga.

ad. 8). Henda grein ásetur reglur um at lata ella leiga kvoturættindi, sum skal gera tað møguligt hjá fiskimonnum at útvega sær eitt grundarlag, sum so aftur tryggjar frægasta raksturin av fiskifarinum. Eins og við alivinnuni ynskir landsstýrið ikki, at fiskiloyvið og harvið partur av tilfeinginum skal veðsetast.

§ 15, stk. 2 verður standandi óbroytt í lógini.

ad. 9). Landsstýrið heldur, at hóast tilmæli frá § 2- nevndini um ikki at avmarka kvotaflutning millum bólkar, útróðrarfør undir 20 tons undantikin, so eigur ein verja at vera í lógini fyri útróðrarbátar eisini oman fyri 20 tons soleiðis, at kvotur í hesum bólki bert kunnu latast til aðrar útróðrarbátar í húkaveiðu. Útróðrarbátar við egnari kvotu eru trolbátar. Henda kvota kann sostatt bert verða umsett til útróðrarbátar í húkaveiðu. Stk. 3 dettur burtur við broytingini.

ad. 10). Landsstýrið heldur, at tá kvotan av einum ávísum fiskaslagi er uppfiskað, so steðgar fiskiskapurin eftir hesum fiskaslagi beinanvegin, tó má verða loyvt at veiða onnur fiskasløg, sum ikki eru uppfiskað, við at útvega hjáveiðu av tí uppfiskaða fiskaslagnum frá øðrum, sum eiga egnu kvotu, ella sambært stk. 3, at landsstýrið í kunngerð ásetur nærri reglur um, hvussu fiskiskapurin av fiskasløgum, sum ikki eru uppfiskað, kann halda fram. Landsstýrið má eftir tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni tá meta um, um tað er ráðiligt at lata fiskiskapin halda áfram við ávísum proseoti í hjáveiðu, sum ikki slepst undan fyri samstundis at gagnnýta aðrar fiskastovnar, sum ikki eru uppfiskaðir. Hetta kann gerast neyðugt, um talan er um ein bólk av skipum, sum ikki fáa fiskað vegna hjáveiðu av fiskasløgum, sum eru uppfiskað fyri bólkin. Hjáveiðukvotur verða at áseta fyrstu ferð sambært § 27 við gildi frá 1. september 1995. Ein fyribilsskipan fyri hetta kvotuárið verður tó heimilað í hesi grein 18.3.

ad. 11). Greinin ásetur hægsta mark fyri hækking av fiskasløgum sum tosk, hýsu, upsa

og kongafiski, sum ikki fara um føroysku innvigingarskipanina.

ad. 13). Í august 1994 ásetti løgtingið kvotur fyri fiskiárið 1. september 1994 til 31. august 1995. Hesar verða endurtiknar í stk. 1. Haraftrat heldur landsstýrið, at neyðugt verður at áseta hjáveiðikvotur aftrat teimum í stk. 1 nevndu heildarkvotum, sí annars § 5, stk. 7. Fyri inniverandi fiskiár verða hesar hjáveiðukvotur settar til 0 tons, men verða ásettar í seinasta lagi innan 10. august 1995 fyri næsta fiskiár.

Fiskirannsóknarstovan og Stovnsrøktarnevndin skulu sambært § 22 í lógini lata síni tilmæli, sum eisini skal fevna um hesa hjáveiðu, sum so kann veitast eigarum av fiskiførum ella bólkum av fiskiførum, sum í veiðu sambært stk. 3 ikki sleppa undan ávísari hjáveiðu.

ad. 14) og 15). Landsstýrið heldur, at prosentbýtið má verða soleiðis samansett, at tað fevnir um allar veiðibólkar og mugu tí skip, sum veiða alternativ fiskasløg koma við í bólk 7.

Við hesi broyting verður í § 29 skotið upp, at kvoturnar verða lætnar fiskiførum í bólkunum 1 - 3, sum egin kvota eftir sama lykli sum higartil.

Fiskifør undir 110 BRT verða nú skipað í 3 bólkar. Før yvir 20 BRT, sum royna við húki, bólkur 4, før undir 20 BRT, sum royna við húki, bólkur 6 og trolbátar undir 55 tons. Av kvotuni hjá bólki 4 verður frábýtt til bólk 5, tað, sum løgtingið í mars 1994 býtti frá til 13 trolbátar (13*70 tons av toski og 1330 tons av hýsu). Hetta er roknað um til prosent av teimum kvotum (roknaðar um til árskvotur), sum vórðu settar í gildi í mars 1994. Trolbátarnir fáa egna kvotu av toski og hýsu. Í hesum og í ásetingini um, at kvotupartur hjá trolbáti, sum leggur endialiga um til húkaveiðu, fellur aftur til bólk 4, liggur samstundis, at talið av trolbátum ikki kann vaksa út um tað tað, sum verður veitt við troli í hesum kvotuári, 1994/95.

ad. 16). Landsstýrið heldur, at tað er rættari at venda aftur til tær gomlu reglurnar um inndráttu í tráð við líknandi lóggávu í norðurlondum.

1. viðgerð 16. mars 1995. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 1. juni 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1995 og eftir 1. viðgerð tann 16. mars 1995 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við Ivan Johannesen, landsstýrismann, har viðgjørdar vóru tær ymisku broytingarnar í uppskoti landsstýrisins. Nevndin setti fram

skrivligar spurningar og fekk útgreinað skrivligt svar uppá tey ivamál, ið reist vóru á fundinum.

Undir viðgerðini í fiskivinnunevndini eru gjørdar nógvar broytingar og í samráð við fútan eru gjørdar størri broytingar í kap. 9, sum umfata Fiskiveiðueftirlitið og í kap. 10. Og heldur nevndin, tí at neyðugt er at gera eitt nýtt uppskot fyri so greitt sum gjørligt at vísa tær broytingar, sum gjørdar eru.

Nevndin bað Fiskiveiðueftirlitið um veiðutøl, so ein meting fekst av, hvussu nógv veitt var av kvotuni, men orsakað av verkfalli á almenna arbeiðsmarknaðinum frá 16. mars til 10. apríl fingust ongi dagførd veiðutøl. Ikki fyrr enn 20. apríl fekst nøkulunda innlit í, hvussu nógv var veitt tilsamans, og stutt eftir hetta kom fram, at skip við egnari kvotu høvdu nýtt út yvir sín egna part.

Meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Karl Robert Johansen og Álvur Zachariassen) leggur stóran dent á, at tey skip, sum hava mist part av sínu egnu kvotu, av hesi orsøk fyrst fáa tillutað hann aftur, áðrenn býtt verður út av nýggjum, um kvotan annars verður hækkað. Undir viðgerðini í fiskivinnunevndini er greitt komið fram, at Fiskiveiðueftirlitið ikki hevur virkað eftir ætlan og setir meirilutin tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum beinavegin at fáa Fiskiveiðueftirlitið at virka eftir lógini um vinnuligan fiskiskap.

Tá lógin um vinnuligan fiskikap kom í gildi, fingu trolbátar egna kvotu uppá 70 tons av toski og 30 tons av hýsu. Fiskivinnunevndin metti, at talið av trolbátum, ið tá vóru, ikki kundi økjast, men ásannast má, at ikki var nóg væl bundið fyri, og skjýtur nevndin tí upp í § 29 pkt. 5, at talið á trolbátum ikki kann vaksa við tali frá 1. mai 1995.

Meirilutin hevur gjølla viðgjørt spurningin um ásetan av kvotum fyri tað, ið eftir er av kvotaárinum.

Meirilutin ásannar at toskahannið rakar mest útróðrarflotan undir 20 brt. og partrolaraflotan og at ikki ber til, at hesin partur av flotanum verður liggjandi fram til 1. september.

Meirilutin hevur í § 27 ásett toskakvotuna á landgrunninum til 12.500 tons og hýsukvotuna til 7.500 tons. Meirilutin hevur lagt dent á tær tilráðingar, ið komnar eru

frá fiskifrøðingum og ICES, har víst verður á, at samanborið verður við støðuna 1. januar 1995, koma bæði gýtingarstovnurin og stovnurin sum heild at vaksa í 1995 hóast kvotan verður sett nakað upp.

Meirilutin vísir eisini á at fiskiskapurin seinastu tíðina er munandi vaksin, og at fiskimenn vísa á, at lívfrøðiligu viðurskiftini eisini eru nógv batnað og er hetta sostatt eisini ein av orsøkuum fyri, at meirilutin heldur tað verða ráðiligt at hækka kvotuna.

Út frá frammanfyri nevndu viðmerkingum setir meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Karl Robert Johansen og Álvur Zachariassen) fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:
"**§ 1.** Lógin fevnir um vinnuligt at gagnnýta livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi á sjóleiðum uttanfyri føroysku landleiðirnar. Lógin fevnir somuleiðis um at gagnnnýta livandi tilfeingið í føroyskum áum og vøtnum. Lógin fevnir ikki um at gagnnýta hval, kóp, fugl og alifisk."

2) § 5, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 3.** <u>**Veiðiloyvi**</u> sambært hesi lóg er góðkenning, ið Føroya Landsstýri veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku landleiðunum og á leiðum uttanfyri føroysku landleiðirnar."

3) § 5, stk. 9 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 9** <u>**Stovnsrøktarnevndin**</u> Landsstýrið velur Stovnsrøktarnevnd. Fiskiveiðifeløgini umboðandi trol- og húkaveiðu hava hvør sínar tveir limir og tiltakslimir í stovnsrøktarnevnd, sum

lagtingslov om ændring i lagtingslov om erhvervsmæssigt fiskeri.

§ 1.

I lagtingslov nr. 28 af 10. marts 1994 om erhvervsmæssigt fiskeri foretages følgende ændringer:

1) § 1 affattes således:
"**§ 1.** Loven omfatter erhvervsmæssig udnyttelse af de levende ressourcer på det færøske fiskeriterritorium og for fiskefartøjer under færøsk flag på havområder udenfor det færøske fiskeriterritorium. Loven omfatter ligeledes udnyttelse af de levende ressourcer i færøske vandløb og søer. Loven omfatter ikke udnyttelse af hvaler, sæler, fugle og opdrætsfisk."

2) § 5, stk. 3 affattes således:
"**Stk. 3.** <u>**Fangsttilladelse**</u> i henhold til denne lov er den godkendelse, som Færøernes landsstyre tildeler et bestemt fiskefartøj til fangst på det færøske fiskeriterritorium og i havområder udenfor det færøske fiskeriterritorium."

3) § 5, stk. 9 affattes således:
"**Stk. 9.** <u>**Stovnsrøktarnevndin**</u> Landsstyret vælger "stovnsrøktarnevnd".

gevur landsstýrinum sítt tilmæli um mest loyvdu veiði. Nevndin verður vald fyri 4 ár í senn. Landsstýrið ger reglugerð um val og virki nevndarinnar og tryggjar nevndini kunnleika til tey tilmæli, ið Fiskirannsóknarstovan letur landsstýrinum. Fiskirannsóknarstovan tilnevnir skrivara í stovnsrøktarnevndina."

4) § 9, stk. 1, nr. 7 verður orðað soleiðis:
"Hvussu mótroknað verður, um veitt verður út um kvotuna og um hvussu virðið í mótrokningini verður at nýta."

5) § 10, stk. 5 og stk. 6 verða orðað soleiðis:
"**Stk. 5.** Á landleiðunum og í føroyskum havnum er tað bannað fiskiførum, sum eru undir fremmandum flaggi og fremmandum ríkisborgarum at reka vinnuligan fiskiskap yvirhøvur, herundir fáast við slíkt, ið stendur í samband við fiskiskap, so sum umskiping av fongi, virking, pakking ella onnur handfaring av fiski ella fiskavøru, umskiping av útgerð ella ankring við tí í hyggju at taka lut í umskiping av fiski ella taka inn útgerð.
Stk. 6 Landsstýrinum er heimilað at gera undantak frá forboðnum í stk. 1 og stk. 5 og heimilað at gera nærri reglur hesum viðvíkjandi."

6) í § 10 verður sum nýtt stk. 7 sett:
"**Stk. 7.** Eisini er bannað fiskiførum, sum eru undir fremmandum flaggi og fremmandum ríkisborgarum, at koma á føroyskt sjóøki ella í føroyska havn uttan í skaðaleysari gjøgnumsigling, um so er, at tey hava brotið reglur fyri fiskiskapi uttan fyri føroysku landleiðirnar, sum fiskifør undir føroyskum flaggi sambært millumlanda avtalur eru bundin at halda."

7) § 13 verður orðað soleiðis:

Fiskeriforeningerne, der repræsenterer trawl- og krogfiskeri har hver to medlemmer og suppleanter for disse i "stovnsrøktarnevnd", som afgiver indstilling til landsstyret om højst tilladte fangst. Udvalget vælges for fire år ad gangen. Landsstyret udfærdiger regler vedrørende valg af udvalget og dets virksomhed og drager omsorg for, at udvalget er informeret om indholdet i de indstillinger Færøernes Fiskeriundersøgelser tilstiller landsstyret. Færøernes Fiskeriundersøgelser udpeger sekretæren for udvalget."

4) § 9, stk. 1, nr. 7 affattes således:
"Hvorledes modregning skal ske, såfremt der fiskes udover den tildelte kvote, og hvordan provenuet i modregningen skal anvendes."

5) § 10, stk. 5 og 6 affattes således:
"**Stk. 5.** Det er forbudt fiskeskibe under fremmed flag og fremmede statsborgere, på fiskeriterritoriet og i færøsk havn at udføre erhvervsmæssigt fiskeri, herunder at foretage sig noget, der har forbindelse med fiskeri, såsom omladning af fangst, forarbejdning og pakning af fangst eller anden håndtering af fisk eller fiskeprodukter, omladning af udrustning eller opankring med den hensigt at deltage i omladning af fisk eller ombordtagning af udrustning.
Stk. 6. Landsstyret er bemyndiget til at dispensere fra forbudet i stk. 1 og stk. 5 og at udfærdige nærmere regler herfor."

6) I § 10 indsættes som nyt stk. 7:
"**Stk. 7.** Det er ligeledes forbudt fiskefartøjer under fremmed flag og fremmede statsborgere at komme ind på færøsk søterritorium eller i færøsk havn, undtagen i skadesløs gennemsejling, hvis de har overtrådt regler for fiskeri udenfor færøsk fiskeriterritorium, som fiskefartøjer under færøsk

"**§ 13.** Eingin við rættindum eftir § 12 kann ráða yvir meira enn 10% av hvørjari heildarkvotu á føroysku landleiðunum."

8) § 15, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Egin kvotupartur kann verða latin ella útleigaður øðrum, um teir lúka treytirnar í lógini annars, við teimum avmarkingum, sum ásettar eru í stk. 2 og § 16. Landsstýrið skal hava fráboðan um flyting av kvotu, áðrenn farið verður at fiska fluttu ella leigaðu kvotuna. Kvotuparturin kann ikki verða settur í veð."

9) § 16 verður orðað soleiðis:
"**§ 16.** Landsstýrið ásetir reglur um, á hvønn hátt kvotur kunnu verða leigaðar, lætnar og fluttar millum bólkar av fiskiførum og veiðihættum."
Stk. 2. Egnir kvotupartar, sum eru grundaðir á veiðu við útróðrarbáti, kunnu bert verða latnir ella leigaðir øðrum útróðrarbátum."

10) § 18 verður orðað soleiðis:
"**§ 18.** Fiskiskapur skal steðga beinanvegin, tá ið heildarkvota, egna árskvotan, felagskvotan ella hjáveiðukvotan av ávísum fiskasløgum er uppfiskað, sbr. tó stk. 3.
Stk. 2. Fiskiloyvi ella partar av fiskiloyvi detta burtur av sær sjálvum, tá ið kvotan er uppfiskað.
Stk. 3. Um veiðan eftir einum ávísum fiskaslagi ger, at fiskiskapurin eftir øðrum fiskasløgum steðgar, kann landsstýrið í kunngerð áseta reglur fyri, hvussu fiskiskapurin eftir teimum fiskasløgum, sum ikki eru uppfiskað, verður at halda áfram.

11) § 19 verður orðað soleiðis:
"**§ 19.** Landsstýrið kann gera av, at veiðinøgdir av ávísum fiskasløgum skulu hækkast við ávísum prosentparti, tá roknað verður, hvussu nógv av egnu árskvotuni ella felagsárskvotuni er nýtt, um fiskurin ikki gongur

flag i henhold til internationale aftaler er forpligtede til at overholde."

7) § 13 affattes således:
"**§ 13.** Ingen med rettigheder i henhold til § 12 kan råde over mere end 10% af hver enkelt totalkvote gældende på færøsk fiskeriterritorium."

8) § 15, stk. 1 affattes således:
"Individuel kvoteandel kan overføres eller udlejes til andre, såfremt disse opfylder lovens betingelser iøvrigt, med de begrænsninger, der er fastsat i stk. 2 og § 16. Overførsel af kvoter skal meddeles landsstyret, inden der påbegyndes fiskeri efter overført eller udlejet kvote. Kvoteandelen kan ikke pantsættes."

9) § 16 affattes således:
"**§ 16.** Landsstyret udfærdiger regler om, på hvilken måde kvoter udlejes, tildeles og overføres mellem grupper af fiskefartøjer og fangstmåder."
Stk. 2. Individuelle kvoteandele, som er tildelt til fiskeri med kystfiskefartøj, kan kun overføres eller udlejes til andre kystfiskefartøjer."

10) § 18 affattes således:
"**§ 18.** Fiskeriet skal ophøre øjeblikkelig, når totalkvote, den individuelle årskvote, den fælles årskvote eller bifangstkvoten for bestemte fiskearter er opfisket, jfr. dog reglerne i stk. 3.
Stk. 2. Fiskeritilladelsen eller dele heraf bortfalder automatisk, når kvoten er opfisket.
Stk. 3. Hvis fangst af en bestemt fiskeart afstedkommer, at fiskeriet af andre fiskearter må ophøre, kan landsstyret i bekendtgørelse fastsætte regler for, hvorledes fiskeriet af de fiskearter, der ikke er opfiskede, kan fortsætte."

11) § 19 affattes således:
"**§ 19.** Landsstyret kan bestemme, at fangstmængder af bestemte fiskearter skal forhøjes med en vis procentdel

gjøgnum føroysku innvigingarskipanina, tó fyri tosk og hýsu upp til 20% og fyri upsa og kongafisk upp til 15%. Óvirkaður fiskur er ósløgdur, sløgdur ella avhøvdaður fiskur, sama hvussu hann er goymdur."

12) Yvirskriftin í kapittul 7 verður broytt soleiðis:

"Kapittul 7
Ymiskar ásetingar"

13) § 27 verður orðað soleiðis:

"**§ 27.** Heildarkvotur á landleiðunum fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verða ásettar fyri hesar fiskastovnar frá 1. september 1994 til 31. august 1995.

Tons rund vekt:

Toskur á Føroya Banka	1.000
Toskur á landgrunninum	12.500
Hýsa	7.500
Upsi	41.500
Kongafiskur	13.300.

Stk. 2. Aftrat heildarkvotum sambært stk. 1 kunnu verða ásettar hjáveiðukvotur fyri fiskifør undir føroyskum flaggi fyri hesar fiskastovnar frá 1. september 1994 til 31. august 1995.

Tons rund vekt:

Toskur á Føroya Banka	00
Toskur á landgrunninum	00
Hýsa	00
Upsi	00
Kongafiskur	00.

Stk. 3. Hjáveiðukvota kann veitast fiskiførum ella bólkum av fiskiførum, sum í veiðu eftir fiskasløgum undir kvotu, ikki sleppa undan hjáveiðu, sum fer út um egnu kvotu ella felagskvotu."

14) § 28 verður orðað soleiðis:

"**§ 28.** Felags kvotupartar verða ásettir fyri hesar bólkar av fiskiførum á føroysku landleiðunum:

Bólkur 1: Ståltrolarar yvir 400 HK, lemmatrolarar.

Bólkur 2: Ståltrolarar yvir 400 HK,

ved beregning af hvor stor en del af individuel eller fælles årskvote, der er fanget, hvis fisken ikke indvejes på Færøerne; for torsk og kuller med op til 20% og for sej og rødfisk med op til 15%. Uforarbejdet fisk er urenset, renset eller hovedkappet fisk, uanset hvilken opbevaringsmåde, der anvendes."

12) Overskriften i kapitel 7 ændres til:

"Kapitel 7
Diverse bestemmelser"

13) § 27 affattes således:

"**§ 27.** Totalkvoter på fiskeriterritoriet for fiskefartøjer under færøsk flag fastsættes for nedennævnte fiskebestande for tidsrummet 1. september 1994 til 31. august 1995:

Tons rund vægt:

Torsk på Føroya Banka	1.000
Torsk på landsokkelen	12.500
Kuller	7.500
Sej	41.500
Rødfisk	13.300.

Stk. 2. Udover totalkvoterne, som nævnt i stk. 1, kan bifangstkvoter fastsættes for fiskefartøjer under færøsk flag for nedennævnte fiskebestande fra 1. september 1994 til 31. august 1995:

Tons rund vægt:

Torsk på Føroya Banka	00
Torsk på landsokkelen	00
Kuller	00
Sej	00
Rødfisk	00.

Stk. 3. Bifangstkvote kan tildeles fiskefartøjer eller grupper af fiskefartøjer, som ved fiskeri af kvoterede fiskearter er ude af stand til at undgå bifangst, der overskrider individuel eller fælles kvote."

14) § 28 affattes således:

"**§ 28.** Fælleskvoteandele fastsættes for følgende fiskefartøjsgrupper på fiskeriterritoriet:

pør.
Bólkur 3: Stállínuskip yvir 110 BRT.
Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 20 BRT á húkaveiðu.
Bólkur 5: Trolbátar undir 85 BRT.
Bólkur 6: Útróðrarbátar undir 20 BRT á húkaveiðu.
Bólkur 7: Onnur veiða.
Stk. 2. Felags kvotupartarnir verða roknaðir hvørjum bólki sær eftir prosentbýti av teimum ymisku fiskastovnunum, tó jvb. stk. 3, soleiðis:

Gruppe 1: Ståltrawlere over 400 HK, skovltrawlere.
Gruppe 2: Ståltrawlere over 400 HK, par.
Gruppe 3: Stållinebåde over 110 BRT.
Gruppe 4: Kystfiskefartøjer over 20 BRT, krogfiskeri.
Gruppe 5: Trawlfartøjer under 85 BRT.
Gruppe 6: Kystfiskefartøjer under 20 BRT, krogfiskeri.
Gruppe 7: Fiskeri iøvrigt.
Stk. 2. Fælles kvotandele beregnes for hver enkelt gruppe i procent af de forskellige fiskebestande på følgende måde:

	Toskur Torsk	Hýsa Kuller	Upsi Sej	Kongafiskur Rødfisk
Bólkur 1: Trol, lemmatrolarar Gruppe 1: Trawl, dørtrawlere	4%	1,75%	13%	90,5%
Bólkur 2: Trol, pør Gruppe 2: Trawl, par	21%	10,25%	69%	8,5%
Bólkur 3: Línuskip Gruppe 3: Lineskibe	23%	28%		
Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 20 BRT, húkaveiða Gruppe 4: Kystfiskefartøjer over 20 BRT, krogfiskeri	14%	21%	10%	0,5%
Bólkur 5: Trolbátar undir 85 BRT Gruppe 5: Trawlfartøjer under 85 BRT	13%	7%	0,5%	
Bólkur 6: Útróðrarbátar undir 20 BRT, húkaveiða Gruppe 6: Kystfiskefartøjer under 20 BRT, krogfiskeri	24%	30%	7%	
Bólkur 7: Onnur Gruppe 7: Andre	1%	2%	0,5%	0,5%

Stk. 3. Verða heildarkvotur hækkaðar, skal hækkingin í bólki 5, jvb. § 29, stk 1, nr. 5, at falla til bólk 4.

15) § 29 verður orðað soleiðis:

"**§ 29.** Innan fyri hvønn av bólkunum av fiskiførum í § 28, stk. 1, sum eru í veiðiflotanum 1. januar 1995 verður egni kvotuparturin hjá skipi roknaður soleiðis:

1) Bólkur 1 verður skipaður í tríggjar undirbólkar soleiðis:

A: Djúpvatns lemmatrolarar 2050 HK ella meira.

B: Djúp- og meðalvatnslemmatrolarar 1200 HK ella meira.

C: Lemmatrolarar minni enn 1200 HK.

Í bólki A verður tillutaða hvørjum skipi av heildarkvotu:

Toskur 0,27%, hýsa 0,12%, upsi 0,59%, kongafiskur 8,23%.

Í bólki B verður tillutað hvørjum skipi av heildarkvotu:

Toskur 0,27%, hýsa 0,12%, upsi 1,19%, kongafiskur 4,17%.

Í bólki C verður tillutað hvørjum skipi av heildarkvotu:

Toskur 0,27%, hýsa 0,12%, upsi 1,19%, kongafiskur 1,91%.

2) Bólkur 2 verður skipaður í tríggjar undirbólkar:

A: Partrolarar størri enn 1150 HK ella meira, byggiár 1984 ella seinni.

B: Partrolarar 700 HK ella meira.

C: Partrolarar minni enn 700 HK.

Í bólki A verður tillutað hvørjum skipi av heildarkvotu:

Toskur 0,6%, hýsa 0,29%, upsi 2,52%, kongafiskur 0,27%. Í bólki B verður tillutað hvørjum skipi av heildarkvtu:

Toskur 0,6%, hýsa 0,29%, upsi 1,92%, kongafiskur 0,24%.

Í bólki C verður tillutað hvørjum

Stk. 3. Dersom totalkvoter øges, skal forøgelsen i gruppe 5, jvf. § 29, stk.1, nr. 5), tilfalde gruppe 4.

15) § 29 affattes således:

"**§ 29.** Inden for hver af grupperne af fiskefartøjer i § 28, stk. 1, der er i fiskeflåden den 1. januar 1995.beregnes fartøjets individuelle kvoteandel således:

1) Gruppe 1 opdeles i tre undergrupper således:

A: Dybvands dørtrawlere 2050 HK eller mere.

B: Dyb- og mellemvandsdørtrawlere 1200 HK eller mere.

C: Dørtrawlere mindre end 1200 HK.

I gruppe A tildeles hvert skib af totalkvote: Torsk 0,27%, kuller 0,12%, sej 0,59%, rødfisk 8,23%.

I gruppe B tildeles hvert skib af totalkvote: Torsk 0,27%, kuller 0,12%, sej 1,19%, rødfisk 4,17%.

I gruppe C tildeles hvert skip af totalkvote: Torsk 0,27%, kuller 0,12%, sej 1,19%, rødfisk 1,91%.

2) Gruppe 2 opdeles i tre undergrupper:

A: Partrawlere større end 1150 HK, byggeår 1984 eller senere.

B: Partrawlere 700 Hk eller mere.

C: Partrawlere mindre end 700 HK.

I gruppe A tildeles hvert skip af totalkvote: Torsk 0,6%, kuller 0,29%, sej 2,52%, rødfisk 0,27%.

I gruppe B tildeles hvert skip af totalkvote: Torsk 0,6%, kuller 0,29%, sej 1,92%, rødfisk 0,24%.

I gruppe C tildeles hvert skib af totalkvote: Torsk 0,6%, kuller 0,29%, sej 1,31%, rødfisk 0,22%.

3) Gruppe 3: Der fordeles ligeligt mellem fartøjerne i gruppen.

4) Gruppe 4 fisker af fælles årskvote.

5) Gruppe 5: Der fordeles ligeligt mel-

skipi av heildarkvotu:
Toskur 0,6%, hýsa 0,29%, upsi 1,31%, kongafiskur 0,22%.

3) Bólkur 3: Býtt verður javnt ímillum skipini í bólkinum.

4) Bólkur 4 fiskar av felags árskvotu.

5) Bólkur 5: Býtt verður javnt millum trolbátarnir í vinnu 1. januar 1995, tó soleiðis, at egna kvotan ongantíð fer upp um 70 tons av toski og 30 tons av hýsu. Um trolbátur leggur um aftur frá troli til línu-/snelluveiðu, fellur hansara egna kvota inn aftur í avvarðandi bólki. Talið av trolbátum kann ikki vaksa við talið 1. januar 1995, men skal minka so hvørt sum trolbátur leggur um til línu-/snelluveiðu ella ikki er í vinnu.

6) Bólkur 6 fiskar av felags árskvotu.

7) Fiskitíðin fyri bátar, ið fiska av felagskvotu, verður býtt í trý tíðarskeið:
1: september - desember
2: januar - aprí
3: mai - august.

Stk. 2. Landsstýrinum verður heimilað, tá fýra mánaðir eru eftir av fiskiárinum, at flyta ónýttar kvotur innanfyri bólkin, ella til annan bólk, sum tørvar hesa kvotu, grundað á tilætlingina í hesi lóg."

15a) Í § 35 verður nýtt stk. 3 og stk. 4 orðað soleiðis:

Stk. 3. Fiskiveiðieftirlitið hevur til eina og hvørja tíð við hóskandi samleikaváttan og uttan rættarúrskurð atgongd til fiskifør og fiskaflutningsfør, sum liggja í havn, og harumframt á øllum støðum, har sum veiða ella partar av hesi verða goymd, flutt og viðgjørd v.m."

"**Stk. 4.** Fiskiveiðieftirlitið kann gera kanningar ella lata kanningar gera, herundir staksýniseftirlit og innvigingareftirlit, innheintað skjøl og upplýsingar, geva boð og forboð í tí vavi og á teimum økjum, har tað verður mett neyðugt fyri at fremja eftirlitið."

lem fartøjerne i drift 1. mai 1995 dog således, at den individuelle kvoteandel aldrig overstiger 70 tons torsk og 30 tons kuller. Såfremt et trawlfartøj, permanent, lægger om fra trawl til line-/snellefangst, falder dennes individuelle kvoteandel til gruppe 4. Antallet af trawlfartøjer kan ikke forøges med antallet den 1. maj 1995, men skal formindskes henholdsvis, når trawlfartøj lægger om til line-/snellefangst, eller er ikke i drift.

6) Gruppe 6 fisker af fælles årskvote.

7) Fisketiden for både, der fisker af fælleskvote, deles op i tre perioder:
1: september - december
2: januar - april
3: maj - august.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til, når der resterer fire måneder af fiskeriåret, at overføre uudnyttede kvoter indenfor gruppen eller til andre grupper, der har behov for denne kvote, baseret på principperne i denne lov."

15a) Som nyt § 35, stk. 3 og stk. 4 indsættes følgende:

"**Stk. 3.** Fiskerikontrollen har til enhver tid mod behørig legitimation og uden retskendelse adgang til fiskefartøjer og fisketransportfartøjer, der ligger i havn, og iøvrigt overalt, hvor fangst eller dele deraf opbevares, transporteres og behandles m.v."

" **Stk. 4.** Fiskerikontrollen kan herunder foretage undersøgelser, udtage prøver eller lade prøver udtage, foretage kontrolvejning, indhente dokumentation og oplysninger, samt meddele påbud og forbud i det omfang og på de områder, hvor det skønnes nødvendigt for kontrollens udøvelse."

15b) Som nyt § 35a indsættes:

"**§ 35a.** De ansvarlige for et parti fangst eller dele heraf er pligtige at være fiskeri-

15b) Nýggj § 35a verður orðað soleiðis:
"**§ 35a.** Tey, sum hava ábyrgd av veiði ella partar av hesi, hava skyldu til at hjálpa fiskiveiðieftirlitinum í tænastuliga kanningum sínum og hava rætt til at verða til staðar undir slíkum kanningum."
15c) Nýggj § 35b verður soleiðis:
"**§ 35b.** Nøgdir av veiði, sum er fiskað stríðandi ímóti reglum um fiskiskap, mugu ikki verða goymd, flutt ella viðgjørd v.m.
Stk. 2. Keyparar ella móttakarar av tílíkum nøgdum av veiði ella partar av hesi, sum fiska stríðandi ímóti reglunum í stk. 1, ella hvørs innihald ikki er í samsvar við reglur um veiðisamanseting, kunnu bera seg undan ábyrgd við móttøkuni at siga fiskiveiðieftirlitinum frá og uppgeva metta veiðinøgd og slag og samanseting við navni á tí, sum letur nøgdina, og bústaðir hansara.
Fráboðað nøgd av veiði ella partur av hesi skal verða goymd soleiðis, at eftirlit kann fremjast og má ikki verða flutt ella verða viðgjørd uttan samtykki frá Fiskiveiðieftirlitinum.
Stk. 3. Koma fyri nøgdir av veiði ella partar av hesi, veidd ímóti galdandi reglum, verður øll nøgdin at meta sum veitt soleiðis, uttan so at tann nøgd, sum er veidd stríðandi ímóti galdandi reglum, verður skild frá, meðan fiskiveiðieftirlitið er á staðnum fyri at staðfesta, hvussu stór tann ólógliga veiðan er."
16) § 40, stk. 1, nr. 3) verður broytt soleiðis:
"**3)** brýtur reglurnar í §§ 7 og 11, § 18, stk. 2, § 21, stk. 1, 1. punktum, § 24, stk.2, §35a, §35b og reglur ásettar við heimild í § 21 annars."
16a) Í § 42 verða stk. 1 og stk. 2 broytt soleiðis:
"**§ 42.** Fyri inndrátt eru reglurnar í borgarligu revsilógini galdandi. Veiða ella virði av veiðu kann tó verða inndrigið, hóast tað ikki er endaliga staðfest, at øll veiðan er fiskað ólógliga.

kontrollen behjælpelige ved udøvelse af tjenstlige handlinger og har ret til at overvære udøvelse af sådanne handlinger."

15c) Som nyt § 35b indsættes:
"**§ 35b.** Partier af fangst, der er fisket i strid med regler om fiskeriets udøvelse, må ikke opbevares, transporteres eller behandles mv.
Stk. 2. Købere eller modtagere af partier af fangst eller dele deraf, som er fisket i strid med de i stk. 1 nævnte forskrifter, eller hvis indhold ikke er i overensstemmelse med forskrifter om fangstens sammensætning, kan fri sig for ansvar ved i forbindelse med modtagelsen at gøre anmeldelse til fiskerikontrollen med angivelse af fangstens omtrentlige størrelse og sammensætning samt afsenderens navn og adresse. Anmeldt fangst eller dele heraf skal opbevares, således at tilsyn hermed kan udøves, og må ikke transporteres eller behandles mv. uden samtykke fra fiskerikontrollen.
Stk. 3. For så vidt der forekommer partier af fangst eller dele deraf, hvis indhold er i strid med gældende forskrifter, betragtes hele partiet som bestående heraf, medmindre frasortering af den ulovlige del finder sted under fiskerikontrollens tilsyn eller prøveudtagning foretages for at fastslå den ulovlige dels omfang."
16) § 40, stk. 1, nr. 3) affattes således:
"**3)** overtræder bestemmelserne i § 7, § 11, § 18, stk. 2, § 21, stk. 1, 1. pkt., § 24, stk. 2, § 35a, § 35b og bestemmelser i henhold til § 21."
16a) I § 42 ændres stk. 1 og stk. 2.
"**§ 42.** Vedrørende konfiskation er bestemmelserne i borgerlig straffelov gældende. Fangst eller værdi heraf kan dog konfiskeres, selv om det ikke er endeligt konstateret, at al fangsten er fisket ulovlig.
Stk. 2. Overtrædes reglerne om forbud mod at kaste fangst over bord, såfremt der er fisket på lukket eller fredet område,

Stk.2. Fyri brot á reglurnar um útblaking og brot á reglurnar um at veiða á stongdari leið ella á friðaðum øki, veiða við ólógligum reiðskapi, veiða uttan veiði- ella fiskiloyvi ella veiða útum ásetta kvotu kann øll veiðan og reiðskapur verða inndrigið, herundir net, lemmar, sleiðitrossar, línur, uppstandarar v.m. líkamikið hvørs ogn hetta er."

16b) Í § 44 verður § 41 broytt til § 40.

16d) Í § 45, stk. 1 gongur út "nr. 8" og í danska lógartekstinum verðnr § 19 broytt til § 18.

fisket med ulovlige redskaber, fisket uden fangst- eller fiskeritilladelse eller fisket ud over den tilladte kvote, kan der ske konfiskation af hele fangsten og samtlige fiskeredskaber, herunder net, skovle, slæbetrosser, liner, opstandere m.v., uanset hvem disse tilhører."

16b) I § 44 skal § 41, ændres til § 40.

16d) I § 45, stk. 1, udgår "nr.8" og i den danske lovtekst ændres § 19, til § 18.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Tó fáa broytingarnar nr. 14) og 15) ikki gildi fyrr enn frá 1. september 1995.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort. Dog træder ændringerne nr. 14) og 15) ikki i kraft før 1. september 1995.

Ein minniluti (John Petersen) tekur ikki undir við løgtingslógini um vinnuligan fiskiskap og hevur hesar viðmerkingar.

Fólkaflokkurin vísti á, longu tá lógin var á fyrsta sinni til viðgerðar í tinginum, at hetta var ein ónýtilig skipan ið allir partar vóru ímóti, sjálvt teir, ið samtyktu hana eisini.

Fólkaflokkurin vísti á, har henda skipan hevur verið í gildi í longri tíð, er støðan bara versnað innan fiskivinnuna. Trupulleikarnir gerast so stórir, at ringt fyri ikki at siga ómøguligt er at reka fiskiskap. Hetta í londum har fiskiskapur bert er ein lítil partur av tjóðarbúskapinum, hvussu so í Føroyum, har allur tjóðarbúskapurin er tengdur at fiskivinnuni.

Besta prógvið um, hvussu ónýtilig henda skipan er, er tann støða vit sjálvir eru staddir í har allur fiskiskapur er steðgaður sjalvt um stórar nøgdir eru eftir, ið loyvt er at fiska, liggur hvør fjøl bundin við kai. Hvørjar avleiðingar hetta kann hava fyri fiskivinnuna er ringt at ímynda sær, tí er alneyðugt í einum landi har alt hvílur á fiskivinnuni at vit hava slíkar skipanir, har slíkt ikki kann henda.

Fört var fram, tá skipanin kom, at henda skuldi verða við til at byggja fiskastovnarnar uppaftur. Um hugt verður eftir teimum londum har henda skipan er galdandi, síggja vit, at fiskarstovnar verða niðurfiskaðir við stórari ferð, uttan at hetta kemur samfelagsbúskapinum til góðar.

Á ferð í Íslandi fyri stuttum var upplýst at í 1994 hevði helst eitt útkast verið av kvoteraðum fiskasløgum heilt upp til 100 túsund tons, teir ið sótu við skrivstovuborðið mettu útkastið at liggja millum 30 og 50%. Fyri fáum árum síðani hevði Ísland ein fiskiskap eftir toski uppá 3-400 túsund tons um árið. Eftir at hesin fiskiskapur er kvoteraður og kvotaskipanin av álvara fór at virka er fiskiskapurin komin niður á 155 túsund tons um árið, ið kemur samfelagsbúskapinum til góðar, onnur 80 túsund tons verða grítt í havið aftur.

Í fyrsta lagi koma hesi tons ikki samfelagnum til góðar, í øðrum lagi er hetta við til at niðurpína fiskastovnin, tí sum oftast er útkast smáfiskurin ið hevur lægri prís enn tann stóri fiskurin sum betri loysir seg at føra til lands, tí hesin gevur betri prís og harvið fæst meir fyri tillutaðu kvotuna. Fleiri onnur dømi kundi við nevnd, men nokk við tí.

Føroyar eru ikki komnar har enn, men um henda lóg framhaldandi kemur at vera í gildi, hava vit neyvan gott í væntu og ikki at tala um, um eftirlitið verður gjørt strangari eis og royndir eru gjørdar aðrastaðni við at økja eftirlitsfólk uppá sama tal sum fiskarar eru.

Minnilutin (John Petersen) vísir eisini á at fiskiskapurin seinastu tíðina er munandi vaksin, og at fiskimenn vísa á, at lívfrøðiligu viðurskiftini eisini eru nógv batnað og er hetta sostatt ein av orsøkunum fyri, at minnilutin heldur tað verða ráðiligt at hækka kvotuna.

Við hesum viðmerkingum setir tí minnilutin (John Petersen) fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um Vinnuligan fiskiskap

§ 1. § 27 stk. 1, toskur á landgrunninum "8500" tons verður broytt til: "15.000 tons". Hýsa "6.000" tons verður broytt til: "11.000 tons".	**§ 1.** § 27 1.stk. torsk på landsokkelen "8.500" tons ændret til: "15.000" tons. Kuller "6.000" tons ændres til: "11.000" tons.
§. 2. Henda lóg kemur í gildi beinavegin.	**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

Í hesum sambandi verður tí sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinavegin at fara at evna nýggja fiskivinnulóg til í samráð við vinnuna, sum allir partar kunnu liva við og sum útnyttar alt tilfangið á landgrunninum, ið kann gagnnýtast optimalt og við skilagóðari stovnsrøkt. Skipanin eigur at koma í gildi frá 1. september at rokna.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap.

§ 1. Løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap verður sett úr gildi frá 1. september 1995.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

§ 1. Lagtingslov nr. 28 af 10. marts 1994 om erhvervsmæssigt fiskeri sættes ud af kraft fra 1. september 1995.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Minnilutin (Jákup Olsen) tekur ikki undir við kvotulógini og hevur hesar viðmerkingar:

Kristiligi Fólkaflokkurin, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur vísti á longu, tá ið kvotalógin á fyrsta sinni var til viðgerðar her á løgtingi, at hetta var ein púra ónýtilig skipan, sum øll vóru ímóti, og sum danska stjórnin trokaði inn á okkum.

Danir áttu longu tá at fingið tað mótspælið, sum tað er líkt til, at einmælta samtykt løgtingsins hin 19. januar í ár um dómarakanning í bankamálinum hevur verið teimum.

Tí hava vit fingið tað burtur úr samtyktini um dómarakanning, at danska stjórnin síðan hevur slept krøvum sínum m.a. viðvíkjandi broytingum í kvotalógini, áðrenn hon umfíggjar forfallin útlendsk lán.

Tað er sannføring okkara, at vit høvdu fingið uppaftur meira burturúr, um vit framhaldandi høvdu staði saman sum ein maður og bæði hildið fast um dómarakanningina í bankamálinum og eisini kraft, at kvotaskipanin varð koyrd á vestfallið.

Sum stjórin á fiskirannsóknarstovuni segði á fundi í fiskivinnunevndini, tá ið kvotalógin í fjør varð samtykt, so ber ikki til at umsita eina skipan, sum vinnan ikki góðtekur.

Tíðin, sum gingin er, síðan kvotalógin varð samtykt, hevur til fulnar prógvað orð hansara, og júst í hesum døgum liggur trolaraflotin, orsakað av kvotulógini og hann verður liggjandi í mánaðir, um lógin verður ikki avtikin ella broytt munandi.

Ístaðin fyri kvotaskipan mælir Kristiligi Fólkaflokkurin, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur til, at vit fara undir eina skipan við sokallaðum tekniskum reguleringum, t.e. friðingum, legudøgum sum t.d. hvíld sunnu- og halgidagar, skipan við fiskidagatali og skipan við avmarkaðum tali av størri skipum, ið kunnu fiska frítt á djúpri vatni.

Tí setir minnilutin (Jákup Olsen) fram soljóðandi

I Uppskot

til

samtyktar

Kvotalógin frá 10. mars 1994 verður avtikin og farið verður ístaðin undir skipan við tekniskum reguleringum av fiskiskapinum undir Føroyum sum friðingum, legudøgum v.m.

Minnilutin (Jákup Olsen) loyvir sær eisini at vísa til, at neyðugt er við víðkaðum friðingum av gýtingarleiðum sum t.d. cysturi í Holinum, sum meirilutin í fiskivinnunevndini og landsstýrið í fjør opnaðu fyri trolveiðu í februar og mars, tá ið upsin leitar hagar at gýta.

Tað er tann beri løtuvinningur, og tað vil koma okkum aftur um brekkur í ólukkumáta, um fiskurin ikki fær frið at gýta. Húkurin órógvar bert lítið, tí er óneyðugt at friða fyri húkaveiðu.

Minnilutin (Jákup Olsen) loyvir sær eisini at vísa á tey út av lagi vánaligu korini, sum útróðrarmenn fáa at virka undir. Ofta hava teir verið noyddir at steðga í mánaðir eftir pengum sínum frá Lønjavningargrunninum, einki fáa teir frá ALS, um teir gerast arbeiðsleysir og eiga part í bátinum, og avmarkingar eru av fiskivinnunevndini og landsstýrinum settar fyri bátum undir 20 brutto reg. tons viðvíkjandi minstaforvinningi. Hesar avmarkingar eiga beinanvegin at verða avtiknar, so at munur ikki longur verður gjørdur á fiskimonnum.

Eisini kann verða víst á, at útróðrarmenn eiga einki umboð í nevndini fyri Lønjavningargrunninum, meðan Fiskimannafelagið eigur 2 limir. Tað hevur verið skrivað til landsstýrið um, at útróðrarmenn, sum hava tað mesta samskifti við Lønjavningargrunnin, eisini fáa umboð í nevndina fyri grunnin, men enn hevur landsstýrið ikki latið

við seg komið.

Minnilutin loyvir sær tí at seta fram soljóðandi

II Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at fáa viðtøkurnar fyri Lønjavningargruun Skipsfiskimanna broyttar, soleiðis at útróðrarfeløgini elsini fáa umboð í nevndina fyri grunnin.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) førir fram. Sambært avtaluni frá 1. februar 1993 við donsku ríkisstjórnina stóð, at bygnaðarnevndin skuldi setast og bant tásitindi landsstýri seg til at fylgja tí, sum benda nevnd kom til í sínum áliti. Úrslitið av hesum var at vit fingu kvotalógina. Avtalurnar sum komu aftaná, vóru bundnar av tí sum stóð í 1. februar avtaluni. Sum kunnugt var lógin um vinnufigan fiskiskap løgd fram á løgting 18. desember 1993. Hóast eingin tingmaður tók undir við lógini við 1. viðgerð, var hon kortini samtykt við 2. viðgerð 25. februar 1994. Treytin fyri í heilatikið at viðgera kvotalógina var, at kunngerðin um friðað økir var lýst. Kunngerð nr. 3 frá 6. februar 1994.

Fyri at tryggja, at hesi økir ikki verða avtikin, fer minnilutin at skjóta upp, at henda kunngerð verður innsett sum lógartekstur millum 2. og 3. viðgerð.

Minnilutin hevur størri álit á tekniskum reguleringum sum stovnsrøkt enn kvotum. Hetta er longu nú prógvað, bert 17 mánaðir eftir, at kunngerðin kom í gildi, er munandi meira av fiski, serliga á trolfríu økjunum. Haraftrat kemur, at tær lívfrøðiligu umstøðurnar eisini eru munandi batnaðar.

Hetta er ein semja millum hesi feløg: Meginfelag Útróðrarmanna, Felagið Snelluskip, Felagið Línuskip, Felagið Ídnaðarskip og Felagið Trolskip. (Semjan verður løgd fram sum skjal)
Um omanfyri nevndu heilársfriðingar verða í gildi framyvir og settar inn í sjálva lógina heldur minnilutin at kvoturnar fyri tosk og hýsu kunnu hækkast munandi.
Fyri tosk eini 4-5000 tons á landgrunninum
Fyri hýsu eini 2-3.000 tons .

Hetta kann lata seg gera tí tann effektivi reiðskapurin ikki sleppur inn á størsta partin av toska og hýsuleiðunum, tær eru friðaðar fyri trolinum. Hesar friðingar virka so væl at tað ikki verður neyðugt við nøkrum kvotum um nøkur ár.

Út frá hesum viðmerkingum kann minnilutin (Heini O. Heinesen) taka undir við meirilutanum.

Tó ikki við lógartekstinum í § 28, stk. 2, bólkur 4 og 5, har trolbátarnir eru koyrdir í ein bólk fyri seg har 13% eru tikin av teimum 27 í bólki 4. Tað vil siga, at í prosentum fáa trolbátarnir næstan heltina av bólkinum.

Hóast hetta skulu teir ongantíð hava meir enn 70 tons, meðan ein møgulig hækking fellur innaftur í bólk 4.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) heldur, at rættari var at býtt bólk 4 í egnar kvotur.

2. viðgerð 1. juni 1995. Broytingaruppskot meirilutans samtykt við 22-0 atkvøðum. Upprunauppskotið soleiðis broytt samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskot meirilutans til samtyktar samtykt við 22-0 atkvøðum. Broytingaruppskot minnilutans (John Petersen) fall við 10-0 atkvøðum. Uppskot til samtyktar frá sama fall við 10-0 atkvøðum. Uppskot um avtøku av lógini um vinnuligan fiskiskap fall við 10-0 atkvøðum. Uppskotini I og II til samtyktar frá minnilutanum Jákup Olsen fullu við ávikavist 10-0 og 8-0 atkvøðum.

1. juni 1995 løgdu løgtingsmenninir Anfinn Kallsberg, Lasse Klein, Jenis av Rana og John Petersen fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Undirritaðu løgtingslimir mæla til at gera fylgjandi broytingar í tingmáli nr. 91/94, sum er samtykt við 2. viðgerð.

1. Grein 28, stk. 3 verður strikað.

2. Grein 29, stk. 1-5:
   Bólkur 5: Býrið verður orðað soleiðis:

   1. Bátar undir 30 brt. verður tillutað 19,74% til javnbýtis millum 5 bátar.
   2. Bátar yvir 30 brt. verður tillutað 80,26% til javnbýtis millum 14 bátar.

Uppskotið fall við 9-0 atkvøðum.

1. juni 1995 løgdu løgtingsmenninir Heini O. Heinesen, Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariassen, Tordur J. Niclasen og Jákup Olsen fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð

Í § 1 14) verður í § 28 stk. 2 viðvíkjandi bólkayvirlitinum talvan broytt til soljóðandi:

I § 1 14) ændres i § 28 stk. 2 gruppetavlen til sålydende:

	Toskur Torsk	Hýsa Kuller	Upsi Sej	Kongafiskur Rødfisk
Bólkur 1: Trol, lemmatrolarar Gruppe 1: Trawl, dørtrawlere	4%	1,75%	13%	90%
Bólkur 2: Trol, pør Gruppe 2: Trawl, par	21%	10,25%	68,5%	8,5%
Bólkur 3: Línuskip Gruppe 3: Lineskibe	23%	28%	0,5%	0,5%
Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 20 BRT, húkaveiða Gruppe 4: Kystfiskefartøjer over 20 BRT, krogfiskeri	14%	21%	10%	0,5%
Bólkur 5: Trolbátar undir 85 BRT Gruppe 5: Trawlfartøjer under 85 BRT	13%	7%	0,5%	
Bólkur 6: Útróðrarbátar undir 20 BRT, húkaveiða Gruppe 6: Kystfiskefartøjer under 20 BRT, krogfiskeri	24%	30%	7%	
Bólkur 7: Onnur Gruppe 7: Andre	1%	2%	0,5%	0,5%

Viðmerkingar:

Í hesum broytingaruppskoti verður mælt til at flyta 0,5% av upsa frá bólki 2 ið er bólkurin fyri partrolarar til bólk 3 sum er bólkurin fyri stállínuskip. Eisini verður mælt til at flyta 0,5% av kongafiski frá bólki 1 lemmatrolarar til bólk 3.

Eftir at stállínuskipini hava lagt um til svøvlalínu og sokallaðar skeivar húkar tykist hjáveiðan av upsa at verða væl størri enn fyrr. Út frá hesum halda uppskotstillararnir tað verða rætt, at hesin skipabólkur í felag sleppur at veiða upp til 0,5% av upsakvotuni.

Í galdandi lóg um vinnuligan fiskiskap hava stállínuskipini 1% av kongafiskakvotuni. Sambært uppskotinum frá meirilutanum í fiskivinnunevndini fær hesin skipabólkur ongan kongafisk. Síðani kvotaskipanin kom hava stállínuskipini í stóran mun lagt seg eftir at veiða brosmu og longu á djúpum vatni og hetta ger, at talan verður um ávísa hjáveiðu av kongafiski.

Uppskotið fall við 8-0 atkvøðum.

1. juni 1995 løgdu løgtingsmenninir Heini O. Heinesen, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen og Álvur Zachariassen fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð

Tinglimirnir Heini O. Heinesen, Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariassen og Karl Robert Johansen hava hesar viðmerkingar:
Á ólavsøku kemur nýggja stýrisskipanin í gildi. Hetta merkir at kunngerðir og reguleringar viðvíkjandi fiskiskapi á føroysku landleiðunum ikki longur verða lagdar fyri løgtingsins fiskivinnunevnd til góðkenningar.

Tað avgerandi í hesum broytingaruppskoti er, at kunngerðin um friðaði økir verður broytt til løgtingslóg, til tess at tryggjað at friðaðu økini ikki verða avtikin. Tað er eftir stuttari tíð staðfest, at tekniskar reguleringar eru betri fyri stovnin enn kvotur. Lívfrøðiligu umstøðurnar fyri fiskin á landleiðini eru batnaðar og talar hetta eisini fyri at hækka mest loyvdu veiðina av toski.

Vit halda, at treytin fyri at mest loyvda veiðan av toski og hýsu verður hækkað við ávikavist 4.000 tonsum og 1.500 tonsum er, at tey friðaðu økini verða sett í lógina. Uppskotstillararnir halda at tekniskar reguleringar við friðaðuni leiðum, virka munandi betur sum stovnsrøkt enn bara ein kvotaskipan.

Um vit varðveita tey friðaðu økini, kunnu vit gera okkum vónir um, at sleppa av aftur við galdandi kvotaskipan.

Sostatt seta nevndu tinglimir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap verður sett sum nýtt stk. 4 í § 9.

Veiða við troli v.m.

Leiðir:

Veiða við skovlváð, troli, snurriváð ella líknandi neti er ikki loyvd í teimum tilskilaðu tíðarskeiðunum og leiðunum:
Alt árið innanfyri linjur drignar 12 fjórðingar frá grundlinjunum. Frá forboðnum eru tó tey fiskifør undantikin, ið hava serloyvi til troling og royndir, sum Fiskirannsóknarstovan skipar fyri.

a) Í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. desember, báðir dagar froknaðir, á Føroya Banka innanfyri linjur drignar millum hesi 7 støðini og í hesi raðfylgju:
   1. 60°50'00"N 07°57'00"V
   2. 61°03'00"N 07°57'00"V
   3. 61°15'30"N 08°16'00"V
   4. 61°13'20"N 08°42'12"V
   5. 61°00'00"N 09°11'00"V
   6. 60°48'40"N 09°25'00"V
   7. 60°24'00"N 09°07'00"V

   tó solciðis, at í tíðarskeiðinum frá 1. september til 31. mai, báðir dagar froknaðir, er loyvt at veiða innanfyri linjur drignar millum hesi støð:

Lagtingslov om fiskeri på det indre fiskeriterritorium, med skibe der er registreret på Færøerne.

§ 1. I lagtingslov nr. 28 af 10. marts 1994 om erhvervsmæssigt fiskeri indsættes som nyt stk. 4 § 9.

Fiskeri med trawl, m.v.

Søterritorier:

Fiskeri med skovlvåd, trawl, snurrevåd eller lignende net er ikke tilladt i de specificerede områder og søterritorier: Alt året inden for linjer draget 12 sømil fra grundlinierne. Fra forbudet er dog de fiskefartøjer undtaget, der har særtilladelse til trawling og forsøg som Fiskirannsóknarstovan forestår.

a) I perioden 1. januar til 31. december, begge dage medregnet, på Føroya Banka inden for linier draget mellem disse 7 positioner og i følgende rækkefølge:
   1. 60°50'00"N 07°57'00"V
   2. 61°03'00"N 07°57'00"V
   3. 61°15'30"N 08°16'00"V
   4. 61°13'20"N 08°42'12"V
   5. 61°00'00"N 09°11'00"V
   6. 60°48'40"N 09°25'00"V
   7. 60°24'00"N 09°07'00"V

   Dog således at i perioden fra 1. september til 31. maj, begge dage medregnet er tilladt at fiske inden for linier draget mellem disse positioner:

1. 60°50'00"N 07°57'00"V
2. 60°57'20"N 07°57'00"V
3. 60°45'40"N 08°37'00"V
4. 60°36'30"N 08°45'00"V
5. 60°26'00"N 09°08'25"V
6. 60°24'00"N 09°07'00"V

Hetta veiðubann fevnir ikki um beinleiðis veiði eftir sild og makreli við kraftblokki.

b) Í tíðarskeiðinum frá 20. januar til 1. mars, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1. 61°10'00"N 09°35'00"V
2. 61°35'00"N 09°35'00"V
3. 61°35'00"N 09°20'00"V
4. 61°28'00"N 09°20'00"V
5. 61°10'00"N 09°28'00"V

c) Alt árið 12 fjórðingum úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1. 61°44'48"N 07°43'18"V
2. 61°32'48"N 08°20'30"V.
3. 61°49'00"N 08°41'48"V
4. 61°57'00"N 08°16'30"V.
5. 61°57'00"N 07°59'30"V.

d) Alt árið 12 fjórðingum úr grundlinjuni og innanfyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
1. 62°26'05"N 07°30'00"V
2. 62°30'00"N 07°30'00"V
3. 62°30'00"N 08°00'00"V
4. 62°35'00"N 08°00'00"V
5. 62°47'00"N 07°12'05"V
6. 62°47'00"N 06°30'00"V
7. 62°35'00"N 06°30'00"V

e) Í tíðarskeiðinum frá 1. apríl til 31. januar, báðir dagar froknaðir, 12 fjórðingar úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1. 62°25'00"N 05°52'00"V
2. 62°25'00"N 05°16'00"V
3. 62°03'00"N 05°18'00"V
4. 62°03'00"N 05°50'00"V
5. 62°00'00"N 05°50'00"V

1. 60°50'00"N 07°57'00"V
2. 60°57'20"N 07°57'00"V
3. 60°45'40"N 08°37'00"V
4. 60°36'30"N 08°45'00"V
5. 60°26'00"N 09°08'25"V
6. 60°24'00"N 09°07'00"V

Dette fangstforbud omfatter ikke direkte fiskeri efter sild og makrel med kraftblok.

b) I perioden fra 20. januar til 1. marts, begge dage medregnet, inden for linier draget mellem disse positioner og i denne rækkefølge:
1. 61°10'00"N 09°35'00"V
2. 61°35'00"N 09°35'00"V
3. 61°35'00"N 09°20'00"V
4. 61°28'00"N 09°20'00"V
5. 61°10'00"N 09°28'00"V

c) Alt året 12 sømil fra grundlinierne og inden for linier trukket mellem disse positioner og i denne rækkefølge:
1. 61°44'48"N 07°43'18"V
2. 61°32'48"N 08°20'30"V.
3. 61°49'00"N 08°41'48"V
4. 61°57'00"N 08°16'30"V.
5. 61°57'00"N 07°59'30"V.

d) Alt året 12 sømil fra grundlinien og inden for linier draget mellem disse positioner og i denne rækkefølge:
1. 62°26'05"N 07°30'00"V
2. 62°30'00"N 07°30'00"V
3. 62°30'00"N 08°00'00"V
4. 62°35'00"N 08°00'00"V
5. 62°47'00"N 07°12'05"V
6. 62°47'00"N 06°30'00"V
7. 62°35'00"N 06°30'00"V

e) I perioden fra 1. april til 31. januar, begge dage medregnet, 12 sømil fra grundlinierne og inden for linier trukket mellem disse positioner og i denne rækkefølge:
1. 62°25'00"N 05°52'00"V
2. 62°25'00"N 05°16'00"V
3. 62°03'00"N 05°18'00"V
4. 62°03'00"N 05°50'00"V

6. 62°00'00"N 05°57'05"V

f) Alt árið 12 fjórðingar úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
1. 61°12'00"N 06°22'00"V
2. 61°00'00"N 06°22'00"V
3. 60°56'00"N 06°09'00"V
4. 60°45'00"N 06°13'00"V
5. 60°45'00"N 06°36'00"V
6. 61°27'00"N 07°30'00"V
7. 61°32'30"N 07°27'00"V

g) Alt árið 12 fjórðingar úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
1. 61°37'00"N 07°33'00"V
2. 61°30'00"N 07°45'00"V
3. 61°26'00"N 07°45'00"V
4. 61°26'48"N 07°49'12"V
5. 61°27'18"N 08°04'00"V
6. 61°29'00"N 08°10'00"V
7. 61°30'30"N 08°13'00"V
8. 61°34'30"N 08°15'00"V
9. 61°36'00"N 08°10'00"V
10. 61°31'30"N 07°56'00"V
11. 61°41'00"N 07°38'30"V

h) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember báðir dagar íroknaðir, millum 12 og 19 fjórðingar frá grundlinjuni millum breiddarstigið 61o57'00"N og 315° rættvísandi úr Barðinum (62°08'48"N 07°26'00"V).

i) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember báðir dagar íroknaðir, millum 12 og 19 fjórðingar frá grundlinjunum millum 315° rættvísandi úr Barðinum (62°08'48"N 07°26'00"V) og innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1. 62°30'00"N 07°45'00"V
2. 62°30'00"N 07°30'00"V
3. 62°26'05"N 07°30'00"V
fyri fiskifør við maskinorku uppá 500 HK ella yvir, tó so at hestamegin fyri hvørt nýtt trol ikki fer upp um 500 HK.

j) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31.

5. 62°00'00"N 05°50'00"V
6. 62°00'00"N 05°57'05"V

f) Alt året 12 sømil fra grundlinierne og inden for linier draget mellem disse positioner og i denne rækkefølge:
1. 61°12'00"N 06°22'00"V
2. 61°00'00"N 06°22'00"V
3. 60°56'00"N 06°09'00"V
4. 60°45'00"N 06°13'00"V
5. 60°45'00"N 06°36'00"V
6. 61°27'00"N 07°30'00"V
7. 61°32'30"N 07°27'00"V

g) Alt året 12 sømil fra grundlinierne og inden for linier draget mellem disse positioner og i denne rækkefølge:
1. 61°37'00"N 07°33'00"V
2. 61°30'00"N 07°45'00"V
3. 61°26'00"N 07°45'00"V
4. 61°26'48"N 07°49'12"V
5. 61°27'18"N 08°04'00"V
6. 61°29'00"N 08°10'00"V
7. 61°30'30"N 08°13'00"V
8. 61°34'30"N 08°15'00"V
9. 61°36'00"N 08°10'00"V
10. 61°31'30"N 07°56'00"V
11. 61°41'00"N 07°38'30"V

h) I perioden fra 1. januar til 31. december begge dage medregnet, mellem 12 og 19 sømil fra grundlinien mellem bredegraden 61 gr. 57'00"N og 315 gr. retvisende fra Barðinum (62 gr. 08'48"N 07gr. 26'00"V)

i) I perioden fra 1. januar til 31. december begge dage medregnet, mellem 12 og 19 sømil fram grundlinierne mellem 315 gr. retvisende fra Barðinum (62 gr. 08'48"N 07 gr. 26'00" V) og inden for linier draget mellem disse positioner og i denne rækkefølge:
1. 62°30'00"N 07°45'00"V
2. 62°30'00"N 07°30'00"V
3. 62°26'05"N 07°30'00"V
for fiskefartøjer med maskinkraft på 500 HK eller derover, dog således at hestekraften for hvert nyt trawl ikke

desember báðir dagar íroknaðir, millum 12 og 16 fjórðingar frá grundlinjunum og millum longdarstigið 06°30'00"V og breiddarstigið 62°-25'00"N fyri fiskifør við maskinorku uppá 500 HK ella yvir, tó so at hestamegin fyri hvørt nýtt trol ikki fer upp um 500 HK.

k) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember, báðir dagar íroknaðir, innanfyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
1. 60°54'00"N 06°04'00"V
2. 60°51'00"N 06°04'00"V
3. 60°51'00"N 05°56'00"V
4. 60°54'00"N 05°56'00"V

l) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember, báðir dagar íroknaðir, innanfyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
1. 60°26'00"N 06°32'00"V
2. 60°35'00"N 06°35'00"V
3. 60°35'00"N 06°09'00"V
4. 60°26'00"N 06°10'00"V"

§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

overstiger 500 HK

j) I perioden fra 1. januar til 31. december begge dage medregnet, mellem 12 og 16 sømil fra grundlinierne og mellem længdegrad 06 gr. 30'00"V og bredegrad 62 gr. 25'00" N for fiskefartøjer med maskinkraft på 500 HK eller derover, dog således at hestekraften for hvert nyt trawl ikke overstiger 500 HK.

k) I perioden fraa 1. januar til 31. december begge dage medregnet, indenfor linier dragett mellem disse positioner og i denne rækkefølge:
1. 60°54'00"N 06°04'00"V
2. 60°51'00"N 06°04'00"V
3. 60°51'00"N 05°56'00"V
4. 60°54'00"N 05°56'00"V

l) I perioden fra 1. januar til 31. december, begge dage medregnet, inden for linier draget mellem disse positioner og i denne rækkefølge:
1. 60°26'00"N 06°32'00"V
2. 60°35'00"N 06°35'00"V
3. 60°35'00"N 06°09'00"V
4. 60°26'00"N 06°10'00"V"

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter at den er kundgjort.

Uppskotið fall við 11-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskot landsstýrisins sum broytt av fiskivinnunevndini endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

Lóg nr. 58 frá 2. juni 1995.

92 Uppskot til samtyktar viðvíkjandi Føroya Fiskavirking

Ár 1995, hósdagin 16. mars løgdu tingmenninir Kristian Magnussen og Ingeborg Vinther fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Um ikki virkini, ið nú standa still undir Føroya Fiskavirking, eru farin í gongd aftur áðrenn 1. mai í ár, verður løgtingið at taka tey neyðugu stigini, so virkini verða tikin út úr Føroya Fiskavirking, so at aðrir kunnu taka yvir hesi virki.

Viðmerkingar:

Uppskotsstillararnir halda, at nú er bráðneyðugt at fáa arbeiði aftur á fiskavirkjunum, og um ikki P/f Føroya Fiskavirking kann ella vil skapa arbeiði aftur á hesum virkjum, meta vit, at tað er ein samfelagsuppgáva at taka neyðugu stigini til, at onnur, sum hava áhuga í hesum, sleppa framat.

Víst verður á, at hóast nógv virki standa tóm, so er í nøkrum oyggjum so at siga einki fiskaarbeiði, og uppskotsstillararnir halda, at møguleiki skuldi verið fyri at fingið gongd aftur á hesi fiskavirki.

Víst verður á, at lokalar kreftur hava roynt at fingið í lag leigusáttmála við P/f Føroya Fiskakavirking, men í stóran mun tykist P/f Føroya Fiskavirking at forða hesum kreftum í at royna at fáa virksemi aftur í landinum. Hetta stendur í beinleiðis mótsøgn til orðini hjá leiðsluni fyri Fiskavirking, tá teir lovaðu, at nevnda felag skuldi vera lokomotivið í føroyskum vinnulívi.

Serliga átaluvert er tað, at Fiskavirking eisini tykist at hava kannað sær rættin til allan tann fisk, sum verður veiddur undir Føroyum, nú teir sum treyt fyri at leiga út teir tómu virkisbygningarnar krevja, at hesi virkir ikki skulu taka ímóti og arbeiða fisk undan Føroyum.

Vert er at hava í huga, at hesin fiskur er okkara felags náttúrugivna ríkidømi, og tað hevur neyvan verið ætlanin hjá politikarunum, at Fiskavirking skuldi kanna sær einkarrættin til hendan fiskastovn.

Víst verður eisini á, at leiðslan fyri P/f Føroya Fiskavirking við tiltøkum sínum, har teir hava tikið stig til at tøma nøkur av fiskavirkjunum fyri rakstrargøgn, hava skapt slíka

øsing millum arbeiðsfólkið á staðnum, at henda framferð nú tykist at kunna føra við sær álvarsligar trupulleikar.

Uppskotsstillararnir halda tí, at tað er í tøkum tíma, at Føroya Løgting og Føroya Landsstýri taka neyðugu stigini til at forða fyri teimum sera óhepnu avleiðingum, sum framferðin hjá P/f Føroya Fiskavirking longu hevur havt, og eisini skapa møguleikar fyri, at virksemi aftur kemur í gongd á teimum fiskavirkjum, sum nú standa tóm.

Skipanin við Fiskavirking var ein loysn, sum politikararnir hava valt, og tí má tað eisini vera upp til politisku myndugleikarnar við neyðugum tiltøkum at skipa so fyri, at Fiskavirking ikki, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis, forðar fyri, at virksemi aftur verður á teim fiskavirkjum, sum nú standa tóm.

Uppskotið varð afturtikið sama dag.

93 Lækkan av prísum og hækkan av tænastustøðinum á strandfaraskipunum

Ár 1995, hósdagin 16. mars legði Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at landsstýrið áleggur strandferðsluni at lækka prísirnar og hækka tænastuna á strandfaraskipunum, til frama fyri útflutningsvinnu, ferðavinnu og føroyingum øllum.

Viðmerkingar:

Eftir í 1993 at hava havt eitt hall upp á nakrar 40 mió. kr., ætlaði strandferðslan at fáa hallið niður á 37 mió. kr. í 1994. Hetta skuldi gerast við sparingum, hækkan av prísum og skerjan av túratali. Tásitandi landsstýri góðtók hesa ætlan og setti 37 mió. kr. av á figgjarlógini fyri 1994 til strandferðsluna.

Strandferðslan so gjørdi. Stórar sparingar við uppsagnum vórðu gjørdar við hampiligum úrsliti, útreiðslurnar minkaðu. Men hin parturin eydnaðist minni væl. Prísirnir vórðu hækkaðir og túratalið skert, serliga á yvirskotsrutunum um Vestmannasund og um Leirvíksfjørð.

Úrslitið fyriliggur nú, og ístaðin fyri minkaðum halli niður á 37 mió. kr., hækkaði tað heilt upp í 49 mió. kr. Tað má tí standa einum og hvørjum greitt, at hetta ikki var rætti hátturin. Tað hevði eisini verið løgið um ein tænastufyritøka við at hækka prísirnar upp í topp og samstundis lækka tænastustøðið kundi betra sítt úrslit, tað er júst tað mótsatta ið hendir. At hækka prísir og lækka tænastuna gav størri hall, so átti tað mótsatta at minka um hallið.

Flutningstørvurin innanoyggja í sambandi við útflutning er nógv vaksin tey seinastu árini. Fyri fáum árum síðani sigldu flutningsskipini í mest sum hvørja havn eftir og við farmi. Nú verður størsti parturin fluttur um bryggjuna í Havn, og tí er flutningur innanoyggja lívsneyðugur fyri útflutningin frá útjagaran og innflutninginum frá miðstaðarøkinum.

Útflutningur av feskum vørum er vaksin nógv, og tí er neyðugt við góðum og bíligum flutningi millum oyggjarnar skal javnvág verða millum ymisku økini í landinum, nú farmaskipini ikki sigla í hvørja havn.

Tá seinasta ferðaætlan varð gjørd, varð serliga lagt eftir yvirskotsrutunum um Leirvíksfjørð og Vestmannasund. Um kvøldið vóru túrar skornir burtur, so seinasta ruta er um nátturðatíð. Leygardag og sunnudag vórðu bæði skipini løgd í 4 tímar mitt um dagin. Hetta ger støðuna ótolandi fyri tey ið noyðast at ferðast, meðan tey nógvu setast aftur, so henda sokallaða sparing bítur seg sjálva í halan. Í komandi ferðaætlan mugu hesir túrar aftur verða sigldir.

M/F Sam, sum røkir siglingina um Vestmannasund, má skiftast út við størri og betri skip sum skjótast. Hetta er fyrsta inntrykk ferðafólk fáa, ið koma um flogvøllin. Langar bíðirøðir av persónbilum, meðan bussar, postbilur og sjúkrabilar koyra framvið við frammíhjárætti.

Flogferðslan tekur meginpartin av fyrrapartinum, og tá sleppa farmabilar við fiski ikki við ferjuni, so her má útflutningur Føroya vikja. Fyrst varð Ternan I tikin úr siglingini, og síðan er túratalið hjá Sam munandi skert. Úrslitið er so vánalig tænasta, at inntøkumissurin er størri enn sparingarnar. Annað størri og betri skip hevði loyst trupulleikan um Vestmannasund.

Ferðavinnan er ætlað at vaksa tey komandi árini. Fleiri útlendingar skulu fáast at leggja meira pening eftir seg í landinum og nú skulu føroyingar fáast at ferðast í egnum landi. Hetta er ætlanin, men samstundis hevur strandferðslan lækkað um tænastuna og hækkað munandi um prísirnar innanoyggja. Tað er ov kostnaðarmikið at ferðast inni í landinum, og tað tálmar munandi um menning av ferðavinnuni.

Um strandferðslan skal kunna betra sítt úrslit er neyðugt at lækka prísirnar og hækka tænastustøðið. Flutningur bæði til og úr høvuðsstaðnum hevur fyri neyðini bíligt og gott flutningssamband fyri at varðveita javnvág millum økir og vinnur. Somuleiðis mugu prísirnir við strandfaraskipunum niður, um vit ynskja ferðavinnuni størri framburð. Neyðugt er at lækka prísirnar niður á uml. tað støðið, teir vóru undan seinastu príshækking.

1. viðgerð 21. apríl 1995. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 16. mars 1995 og eftir 1. viðgerð tann 21. apríl 1995 beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jákup Joensen, Kristian Magnussen, Henrik Old, Álvur Zachariassen, Heini O. Heinesen og Lasse Klein) førir fram, at uppskotið byggir á ta niðurstøðu, at tá hallið hjá strandferðsluni í 1994 øktist frá 37,0 mió. kr. til 49,0 mió. kr. við sparingum,

hækkan av prísum og skerjan av túratali, so má loysnin vera at ganga øvugta leið, sum er at lækka prísirnar og hækka tænastustøðið við øktum túratali.

Nevndi meiriluti heldur ikki, at leiðin til minkað hall hjá strandferðsluni er so einføld og vísir á, at ábyrgdin liggur hjá strandferðsluni at halda seg innan fyri játtanina á fíggjarlógini.

Meirilutin tekur tí ikki undir við fyriliggjandi uppskoti.

Minnilutin (Kjartan I. Joensen) mælir til at samtykkja uppskot fólkafloksins.

2. viðgerð 30. mai 1995. Uppskotið fall við 7-0 atkvøðum.

94 Broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

§ 3 verður orðað soleiðis:

"**§ 3.** Landsstýrið velur nevnd grunsins, sum telur 5 limir og 5 tiltakslimir. Landsstýrið velur formannin og ein tiltakslim

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udviklingsfond for industri, håndværk og servicevirksomheder.

§ 1.

I lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973 om udviklingsfond for industri, håndværk og servicevirksomheder foretages følgende ændring:

§ 3 affattes således:

"**§ 3.** Landsstyret vælger fondens bestyrelse, der udgør 5 medlemmer og 5 suppleanter. Landsstyret vælger formanden

fyri hann. Limir og tiltakslimir verða valdir fyri 4 ár."

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.
Stk. 2. Nýval av nevndum eftir hesi løgtingslóg, fer fram aftaná at lógin hevur fingið gildi og í seinasta lagi 1. oktober 1995.

og en suppleant for denne. Medlemmer og suppleanter vælges for 4 år."

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.
Stk. 2. Ekstraordinært valg af nævn efter denne lagtingslov foretages efter lovens ikrafttræden og senest 1. oktober 1995.

Viðmerkingar:

Løgtingið álegði landsstýrinum við løgtingssamtykt 22. juni 1994 (løgtingsmál nr. 190/1993) at leggja fyri løgtingið innan 1. januar 1995 m.a.:

"- Uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið,

- uppskot til løgtingslóg, og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnar til ríkislóg, sum leggur allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið,

- uppskot til løgtingslóg og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnar til ríkislóg, sum tekur av fyrisitingarligan myndugleika hjá nevndum, stýrum og ráðum og leggur hann til landsstýrið í teim førum, tá ið nevndin, stýrið ella ráðið ikki umboðar serligan yrkiskunnleika ella serlig áhugamál, men bert vanlig politisk áhugamál,

- uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna soleiðis, at hon verður lagað til samtykta stýrisskipanaruppskotið."

Eftir galdandi lóg telur nevnd Menningargrunsins 5 limir og 5 tiltakslimir. Løgtingið velur 4 limir og 4 tiltakslimir. Landsstýrið velur ein lim, sum er formaður, og ein tiltakslim.

Limir og tiltakslimir verða valdir, tá nýtt landsstýri er skipað aftaná hvørt løgtingsval.

Samsvarandi nevndu løgtingssamtykt verður lagt fyri tingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyrritøkur, har skotið verður upp, at teir 4 nevndarlimirnir og 4 tiltakslimirnir, sum løgtingið velur, í staðin verða valdir av landsstýrinum.

Landsstýrið skjýtur upp, at limir og tiltakslimir í staðin fyri at verða valdir, tá nýtt landsstýrið er skipað aftaná hvørt løgtingsval, verða valdir fyri 4 ár í senn.

1. viðgerð 20. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

F e l a g s á l i t

í

løgtingsmáli nr. 94/1994: Broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur,
løgtingsmál nr. 95/1994: Broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya,
løgtingsmál nr. 98/1994: Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting,
løgtingsmál nr. 104/1994: Broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd,
løgtingsmal nr. 105/1994: Broyting í løgtingslóg um Sjónvarp,
løgtingsmál nr. 133/1994: Broyting í ymsum løgtings- og ríkislógum í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Landbúnaðarmál)
og løgtingsmál nr. 147/1994: Broyting í ymsum lógum innan almanna- og heilsuøkið.

Løgtingsmálini nr. 94/1994, nr. 95/1994, nr. 98/1994, nr. 104/1994 og nr. 105/1994 eru løgd fram av landsstýrinum tann 18. apríl 1995.
Løgtingsmálini nr. 94/1994 og nr. 95/1994 vórðu aftan á 1. viðgerð 20. apríl 1995 beind í rættarnevndina.
Løgtingsmálini nr. 98/1994, nr. 104/1994 og 105/1994 vórðu aftan á 1. viðgerð tann 21. apríl 1995 beind í rættarnevndina.
Løgtingsmálini nr. 133/1994 og 147/1994 vórðu aftan á 1. viðgerð tann 24. apríl 1995 beind í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt uppskotini. Felags fyri uppskotini er at sambært nýggju stýrisskipanarlógina fær landsstýrismaðurin, ið umsitur málsøkið formliga ábyrgdina fyri øllum teimum avgerðum, ið verða tiknar innan hansara málsøki. Hetta fevnir eisini um øki, har ið ráð, nevndir og grunnar taka avgerðir. Landsstýrismaðurin hevur tó ikki avgerðarrættin á hesum øki.

Umráðandi er, at hesar nevndir, stovnar, grunnar og ráð v.m. verða undir vanligum parlamentariskum eftirliti sambært nýggju reglunum í stýrisskipanarlógini.
Fyri at fáa samsvar millum ábyrgd og avgerðarrætt, er tað neyðugt at endurskoða alla lóggávuna um nevndir, ráð og grunnar v.m. Landsstýrið eigur tí at fáa eina freist til at endurskoða og samskipa nýggju lóggávuna soleiðis, at henda verða í samsvar við nýggju reglurnar í stýrisskipanarlógini.

Rættarnevndin mælir tí løgtinginum til at samtykkja uppskotini við teirri broyting, at nevndu lógir fara úr gildi 1. januar 1996, og setir tí fram

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur, broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya, broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting, broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd og broyting í løgtingslóg um sjónvarp.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:
Sum nýggj § 12 verður sett:
"Henda lóg fer úr gildi 1. januar 1996."

§ 2.

Í løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 28. april 1992, verður gjørd henda broyting:
Sum nýggj § 23 verður sett:
"Henda lóg fer úr gildi 1. januar 1996."

§ 3.

Í løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting verður gjørd henda broyting:
Sum nýggj § 7 verður sett:
"Henda lóg fer úr gildi 1. januar 1996."

§ 4.

Í løgtingslóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:
Sum nýggj § 7 verður sett:
"Henda lóg fer úr gildi 1. januar 1996."

§ 5.

Í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um Sjónvarp, sum broytt við løgtingslóg nr. 183 frá 18. desember 1992 verður gjørd henda broyting:
Sum nýggj § 14 verður sett:
"Henda lóg fer úr gildi 1. januar 1996."

§ 1.

I lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973 om udviklingsfond for industri, håndværk og service virksomheder foretages følgende ændring:
Som ny § 12 indsættes:
"Denne lov ophæves 1. januar 1996."

§ 2.

I lagtingslov nr. 57 af 2. oktober 1978 om Landsbanki Føroya, som senest ændret ved lagtingslov nr. 46 af 28 april 1992 foretages følgende ændring:
Som ny § 23 indsættes:
"Denne lov ophæves 1. januar 1996."

§ 3.

I lagtingslov nr. 58 af 2. oktober 1978 om styrelsen af undervisningsvæsenet foretages følgende ændring:
Som ny § 7 indsættes:
"Denne lov ophæves 1. januar 1996."

§ 4.

I lagtingslov nr. 11 af 14. februar 1957 om radioudvalg med senere ændringer foretages følgende ændring:
Som ny § 7 indsættes:
"Denne lov ophæves 1. januar 1996."

§ 5.

I lagtingslov nr. 77 af 21. mai 1982 om fjernsyn, som ændret ved lagtingslov nr. 183 af 18. desember 1992, foretages følgende ændring:
Som ny § 7 indsættes:
"Denne lov ophæves 1. januar 1996."

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

§ 6.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

2. viðgerð 26. mai 1995. Broytingaruppskotið til § 1 samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins soleiðis broytt samtykt við 22-0 atkvøðum.

Lóg nr. 82 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 1206-10/95.

95 Broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya

Ár 1995, týsdagin 18. aprtl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 28. apríl 1992 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4, stk. 2, litra a verður orðað soleiðis:
   "5 limir valdir av Føroya Landsstýri. Av hesum skulu 2 hava ávikavist løgfrøðiligan og búskaparligan kunnleika, og teir kunnu ikki vera tinglimir."

lagtingslov om ændring i lagtingslov om Landsbanki Føroya.

§ 1.

I lagtingslov nr. 57 af 2. oktober 1978 om Landsbanki Føroya, som senest ændret ved lagtingslov nr. 46 af 28. april 1992 foretages følgende ændring:

1) § 4, stk. 2, litra a affattes således:
   "5 medlemmer valgt af Føroya Landsstýri. 2 af disse skal have henholdsvis juridisk og økonomisk kundskab og de må ikke være medlemmer af lagtinget."
2) § 4, stk. 2, litra b udgår, og litra c og

2) § 4, stk. 2, litra b verður strikað, og litra c og d verða hereftir litra b og c.
3) § 4, stk. 3, litra a verður orðað soleiðis:
"Teir 2 undir stk. 2 a nevndu, sum skulu hava ávikavist løgfrøðiligan og búskaparligan kunnleika."

d bliver heretter litra b og c.
3) § 4, stk. 3, litra a affattes således:
"De 2 under stk. 2 a nævnte, som skal have henholdsvis juridisk og økonomisk kundskab."

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.
Stk. 2. Nýval av nevndum eftir hesi løgtingslóg, fer fram aftaná at lógin hevur fingið gildi og í seinasta lagi 1. oktober 1995.

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.
Stk. 2. Ekstraordinært valg af nævn efter denne lagtingslov foretages efter lovens ikrafttræden og senest 1. oktober 1995.

Viðmerkingar:

Løgtingið álegði við Løgtingssamtykt 22. juni 1994 (løgtingsmál nr. 190/1993) landsstýrinum at leggja fyri løgtingið innan 1. januar 1995 m.a.:

"- Uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið,

- uppskot til løgtingslóg, og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnar til ríkislóg, sum leggur allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið,

- uppskot til løgtingslóg og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnar til ríkislóg, sum tekur av fyrisitingarligan myndugleika hjá nevndum, stýrum og ráðum og leggur hann til landsstýrið í teim førum, tá ið nevndin, stýrið ella ráðið ikki umboðar serligan yrkiskunnleika ella serlig áhugamál, men bert vanlig politisk áhugamál,

- uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna soleiðis, at hon verður lagað til samtykta stýrisskipanaruppskotið."

Eftir galdandi lóg telur umsjónarráð landsbankans 11 limir
3 limir valdir av løgtinginum
2 limir valdir av landsstýrinum og
6 limir valdir av vinnufeløgunum.

Samsvarandi nevndu løgtingssamtykt verður lagt fyri tingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya har skotið verður upp, at teir 3 limirnir, sum í galdandi lóg verða valdir av løgtinginum, í staðin verða valdir av landsstýrinum.

1. viðgerð 20. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli nr. 95/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Broytingaruppskotið til § 2 samtykt við 21-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins sum broytt av rættarnevndini samtykt við 22-0 atkvøðum.

Lóg nr. 81 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 2560-1/90.

96 Løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarpróvtøku v.m.

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarpróvtøku v.m.

Kapittul 1
HF-útbúgving

§ 1. Skeið til hægri fyrireikingarpróvtøku er ein almennandi og lestrarfyrireikandi útbúgving fyri tilkomin.
Stk. 2. Lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing er eitt tilboð til tilkomin um ískoytisútbúgving á fleiri stigum.

lagtingslov om kursus til højere forberedelseseksamen m.m.

Kapitel 1
HF-uddannelse

§ 1. Kursus til højere forberedelseseksamen er en almendannende og studieforberedende undervisning for voksne.
Stk. 2. Studieforberedende enkeltfagundervisning er et tilbud til voksne om suppleringsuddannelse på flere niveauer.

Kapittul 2

Skeið til hægri fyrireikingarprávtøku

§ 2. Á skeiði til hægri fyrireikingarprávtøku verður undirvíst í alisfrøði, alisfrøðievnafrøði, donskum, enskum, evnafrøði, evning, filmis- og sjónvarpskunnleika, fiskivinnu, fornaldarfrøði, fronskum, føroyskum, geografi, heimspeki, ítrótti, lívfrøði, religión, russiskum, sálarfrøði, samfelagsfrøði, sponskum, støddfrøði, søgu, teldufrøði, tónleiki, týskum, tøkni og vinnulívsbúskapi. Næmingarnir skulu harumframt hava útbúgvingar- og yrkisvegleiðing.

Stk. 2. Landsstýrið kann góðkenna, at undirvising verður givin í øðrum lærugreinum.

§ 3. Hægri fyrireikingarprávtøka gevur atgongd til hægri framhaldslestur.

Stk. 2. Landsstýrið ásetur nærri reglur um skeið til hægri fyrireikingarprávtøku, heruppí hvørjar lærugreinir, ið eru felagslærugreinir og hvørjar, ið eisini ella bert eru vallærugreinir. Landsstýrið ásetur minsta krav til talið og samansetingina av vallærugreinum, ið saman við felagslærugreinunum mynda eina samlaða právtøku hjá tí einstaka næminginum.

Stk. 3. Landsstýrið kann ásetta reglur um, at lærugrein á sama ella hægri stigi á gymnasialum støði kann koma í staðin fyri lærugrein til HF-právtøku.

Stk. 4. HF-útbúgvingin kann takast sum eitt samlað 2-ára skeið ella leggjast til rættis sum stakgreinaundirvísing.

Kapitel 2

Kursus til højere forberedelseseksamen

§ 2. Ved kursus til højere forberedelseseksamen undervises der i fysik, fysik/kemi, dansk, engelsk, kemi, billedkunst, film- og fjernsynskundskab, fiskeri, oldtidskundskab, fransk, færøsk, geografi, filosofi, idræt, biologi, religion, russisk, psykologi, samfundsfag, spansk, matematik, historie, datalogi, musik, tysk, teknologi og erhvervsøkonomi. Eleverne skal herudover have uddannelses- og erhvervsvejledning.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om, at der bliver undervist i andre fag.

§ 3. Højere forberedelseseksamen giver adgang til højere videregående studier.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter nærmere regler om kursus til højere forberedelseseksamen, herunder hvilke fag, der er fællesfag, og hvilke der også eller blot er valgfag. Landsstyret fastsætter minimumskrav til antallet og sammensætning af valgfag, der sammen med fællesfagene udgør en samlet eksamen for den enkelte elev.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte regler om, at fag til HF-eksamen kan erstattes af samme fag på tilsvarende eller højere gymnasialt niveau.

Stk. 4. HF-uddannelsen kan tages som et samlet 2-års HF-kursus eller lægges til rette som enkeltfagsundervisning.

Kapittul 3

Lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing

§ 4. Lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing fevnir um tær lærugreinir og tey støði, sum eru partur av hægri fyrireikingarprióvtøku sambært § 2. Eisini kann verða undirvíst í lærugreinum, sum eru við í lærugreinarøðini á studentaskúlanum, heruppií lærugreinir á hástigi sambært løgtingslóg um studentaskúlaútbúgving og stakgreinalestur á studentaskúlastigi.

§ 5. Lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing gevur við undirvísing í einstøkum lærugreinum ella í útbúgvingarskeiðum, sum eru lagd serliga til rættis, tilkomnum grundarlag fyri framhaldandi útbúgving. Eisini gevur lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing tilkomnum møguleika fyri at taka fskoytisútbúgving til áður tiknar útbúgvingar ella fyri at bøta um vinnumøguleikar sínar.

Stk. 2. Prióvtøkur í einstøkum lærugreinum í HF-lærugreinarøðini kunnu setast saman til eina hægri fyrireikingarprióvtøku sambært § 3.

Stk. 3. Prióvtøkur í einstøkum lærugreinum í lærugreinarøðini á studentaskúlanum kunnu setast saman til studentsprióvtøku eftir nærri reglum, sum landsstýrið ásetur.

Kapitel 3

Studieforberedende enkeltfagsundervisning

§ 4. Studieforberedende enkeltfagsundervisning omfatter de fag og de niveauer, som indgår i højere forberedelseseksamen, jfr. § 2. Endvidere kan der undervises i fag, der er med i gymnasiets fagrække, herunder fag på højniveau, jfr. lagtingslov om gymnasieuddannelse og enkeltfagsundervisning på gymnasieniveau.

§ 5. Studieforberedende enkeltfagsundervisning giver gennem undervisning i enkelte fag eller i uddannelsesforløb, der er specielt tilrettelagt, voksne grundlag for videregående uddannelse. Studieforberedende enkeltfagsundervisning giver også voksne mulighed for at supplere tidligere uddannelser eller for at forbedre deres erhvervsmuligheder.

Stk. 2. Eksaminer i enkelte fag i HF-fagrækken kan sættes sammen til en højere forberedelseseksamen, jfr. § 3.

Stk. 3. Eksaminer i enkelte fag i gymnasiets fagrække kan sættes sammen til studentereksamen efter nærmere regler, som fastsættes af landsstyret.

Kapittul 4

Felags ásetingar

§ 6. Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri undirvísingini, heruppií innihaldið og vavið í teimum einstøku lærugreinunum, og á hvørjum stigi lærugreinirnar verða. Hevur ein lærugrein fleiri stig, kann haldast fram frá lægri til hægri stig. Fyri at halda fram frá lægri til hægri stig í eini

Kapitel 4

Fælles bestemmelser

§ 6. Landsstyret fastsætter nærmere regler for undervisningen, herunder indhold og omfang af de enkelte fag, og på hvilket niveau, fagene er. Har et fag flere niveauer, kan der fortsættes fra et lavere til et højere niveau. For at fortsætte på et højere niveau i et fag, skal eleven have

lærugrein, skal næmingurin hava verið til prøvtøku á tí lægra stignum.
Stk. 2. Undirvísingin í hvørjari lærugrein sambært § 3 endar við prøvtøku, undantiknar eru lærugreinirnar evning, íróttur og tónleikur sum felagslærugreinir í einum samlaðum 2-ára HF-skeiði.
Stk. 3. Næmingar, ið ikki hava tikið lut í undirvísingini til hægri fyrireikingarprøvtøku ella í lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing kunnu fara til prøvtøku sum sjálvlesandi.

§ 7. Landsstýrið ásetur gjøllari reglur fyri HF-prøvtøku, herímillum reglur um krøv og prøvtøkuuppgevingar, prøvtøkur, prøvdøming, prøvtøl umframt útskriving av prógvi.
Stk. 2. Kæra um avgerðir tiknar í sambandi við prøvtøku, herundir um áseting av prøvtali, kann innan 2 dagar aftaná at avgerðin er kunngjørd næminginum leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum, ið landsstýrið ásetur. Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

§ 8. Einstaka næminginum, verður boðin útbúgvingar- og yrkisvegleiðing eftir reglum, ið landsstýrið ásetur.

§ 9. Brekaðir næmingar fáa serliga undirvísing ella sernámsfrøðiliga hjálp eftir reglum, ið Skúlafyrisitingin ásetur.
Stk. 2. Fyri næmingar, sum vegna sjúku ikki kunnu fylgja vanligari undirvísing í longri tíð, verða undirvísingartiltøk framd eftir reglum um sjúkraundirvísing, ið landsstýrið ásetur.

Kapittul 5
Upptøka

§ 10. Umsøkjari kann verða tikin upp á 2 ára HF-skeið til hægri fyrireikingarprøv-

værket til eksamen på det lavere niveau.
Stk. 2. Undervisningen i hvert fag i henhold til § 3 afsluttes med eksamen, bortset fra fagene billedkunst, idræt og musik i et samlet 2-åring HF-forløb.
Stk. 3. Elever, der ikke har deltaget i undervisningen til højere forberedelseseksamen eller i studieforberedende enkeltfagsundervisningen, kan gå til eksamen som selvstuderende.

§ 7. Landsstyret fastsætter nærmere regler for HF-eksamen, herunder regler om krav, pensumopgivelse, eksaminer, censur, karakterer og udstedelse af eksamensbevis.
Stk. 2. Klage over afgørelser, truffet i forbindelse med eksamen, herunder fastsættelse af karakter, kan inden 2 dage efter, at afgørelsen er bekendtgjort for eleven, indbringes for Skúlafyrisitingin efter regler, fastsat af landsstyret. Skúlafyrisitingin's afgørelser kan ikke indbringes for højere administrativ myndighed.

§ 8. Den enkelte elev tilbydes uddannelses- og erhvervsvejledning efter regler fastsat af landsstyret.

§ 9. Handicappede elever får særlig undervisning eller specialpædagogisk hjælp efter regler fastsat af Skúlafyrisitingin.
Stk. 2. For elever, der på grund af sygdom ikke kan følge den sædvanlige undervisning gennem længere tid, iværksættes der sygeundervisningstiltag efter regler, fastsat af landsstyret.

Kapitel 5
Optagelse

§ 10. Ansøgere kan optages på et toårigt HF-kursus til højere forberedelseseksamen.

tøku ella sum stakgreinalesandi, um

1) umsøkjarin er fyltur 19 ár áðrenn 31. desember í tí ári, hann byrjar undirvísingina, og
2) umsøkjarin hevur lokið 10. flokk fólkaskúlans og lokið víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans í føroyskum og donskum, og fráfaringaringarroynd fólkaskúlans í lærugreinunum støddfrøði og enskum.

Stk. 2. Umsøkjarar, ið ikki lúka upptøkutreytirnar eftir stk. 1, nr. 2, kunnu tó takast upp eftir meting rektarans/skeiðleiðarans av persónligum og fakligum dygdum hjá umsøkjaranum.

§ 11. Umsøkjari kann verða tikin upp til lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing sambært reglunum í § 10, stk. 1 og 2.

§ 12. Upptøka til undirvísing, sum í einari lærugrein førir til hægsta gymnasiala stig í lærugreinini sambært § 4, fer fram eftir meting rektarans/skeiðleiðarans av førleika umsøkjarans í hvørjum einstøkum føri.

Kapittul 6
Skeiðsbygnaður

§ 13. Landsstýrið kann seta á stovn og leggja niður HF-skeið. Verður HF-skeið niðurlagt, skal avtøkuskipan gerast samstundis.

§ 14. Undirvísingin fer fram á studentaskúlum og HF-skeiðum landsins. Hesir stovnar kunnu skipa fyri undirvísing eftir hesi lóg á øðrum stovnum undir leiðslu og ábyrgd rektarans/skeiðleiðarans.

Stk. 2. Skeið og skúlar kunnu samstarva um undirvísingartól, høli, fyrisiting, leiðslu, lærarar og valbólkar.

hvis

1) ansøgeren er fyldt 19 år før 31. december i det år han påbegynder undervisningen og
2) ansøgeren har afsluttet 10. klasse i folkeskolen og afsluttet folkeskolens udvidede afgangsprøve i færøsk og dansk, og folkeskolens afgangsprøve i fagene matematik og engelsk.

Stk. 2. Ansøgere, der ikke opfylder optagelsesbetingelserne efter stk. 1, nr. 2, kan dog optages efter rektors/kursuslederens vurdering af ansøgerens personlige og faglige egenskaber.

§ 11. Ansøger kan optages til studieforberedende enkeltfagsundervisning i henhold til reglerne i § 10, stk. 1 og 2.

§ 12. Optagelse til undervisning, der i et fag fører til højeste gymnasiale niveau i faget i henhold til § 4, sker i hvert enkelt tilfælde på grundlag af rektors/kursusleders vurdering af ansøgerens kvalifikationer.

Kapitel 6
Kursusstruktur

§ 13. Landsstyret kan oprette og nedlægge HF-kurser. Hvis et HF-kursus nedlægges, skal der samtidig udarbejdes en afviklingsplan.

§ 14. Undervisningen foregår ved landets gymnasier og HF-kurser. Disse institutioner kan organisere undervisning ifølge denne lov ved andre institutioner under rektors/kursuslederens ledelse og ansvar.

Stk. 2. Kurser og skoler kan samarbejde om undervisningsudstyr, lokaler, administration, ledelse, lærere og valghold.

§ 15. Landsstýrið tryggjar skeiðsrúmd til 2-ára HF-skeiðsundirvísing, soleiðis at allir umsøkjarar, ið lúka upptøkutreytirnar sambært § 10, verða tiknir upp.
Stk. 2. Landsstýrið kann áseta reglur um samskipan av undirvísingartilboðum innan stakgreinalestur í ávísum lærugreinum, ið eru neyðugar fyri upptøku til hægri framhaldslestur, umframt at áleggja verandi HF-skeiðum at skipa undirvísing í tílíkum lærugreinum.

Kapittul 7
Leiðsla

§ 16. Landsstýrið setur í starv og loysir úr starvi rektara/skeiðleiðara.

§ 17. Rektarin/skeiðleiðarin er leiðari skeiðsins og hevur ábyrgdina av virksemi skeiðsins mótvegis landsstýrinum.
Stk. 2. Rektarin/skeiðleiðarin hevur námsfrøðiligu ábyrgdina av undirvísingini og prøvtøkuni á skeiðinum mótvegis Skúlafyrisitingini.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin kann geva rektaranum/skeiðleiðaranum boð í námsfrøðiligum málum.
Stk. 4. Rektarin/skeiðleiðarin leiðir og býtir arbeiðið millum lærarar og starvsfólk á skeiðinum og tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingum.
Stk. 5. Rektarin/skeiðleiðarin heldur prøvtøku og skrívar prógvini.

§ 18. Á hvørjum HF-skeiði verður skipað lærararáð, lærarafundur og samstarvsnevnd eftir reglum, ið Skúlafyrisitingin ásetur.
Stk. 2. Um studentaskúli og HF-skeið eru undir somu lon, verður skipað eitt felags lærararáð.

§ 19. Á hvørjum HF-skeiði verður skipað

§ 15. Landsstyret sikrer kursuskapacitet til de toårige HF-kurser, således at alle ansøgere, der opfylder optagelsesbetingelserne i § 10, kan optages.
Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om koordinering af undervisningstilbud indenfor enkeltfagsundervisningen i visse fag, der er nødvendige for optagelse til højere videregående studier, og desuden pålægge nuværende HF-kurser at organisere undervisningen i sådanne fag.

Kapitel 7
Ledelse

§ 16. Landsstyret ansætter og afskediger rektor/kursusleder.

§ 17. Rektor/kursusleder er kursets leder og har ansvaret for kursets virksomhed overfor landsstyret.
Stk. 2. Rektor/kursusleder har det pædagogiske ansvar for kursets undervisning og eksaminer på kurset overfor Skúlafyrisitingin.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin kan give rektor /kursusleder pålæg i pædagogiske spørgsmål.
Stk. 4. Rektor/kursusleder leder og fordeler arbejdet mellem lærere og personalet på kurset og tager alle konkrete afgørelser vedrørende eleverne.
Stk. 5. Rektor/kursusleder afholder eksamen og udsteder eksamensbevis.

§ 18. Ved hvert HF-kursus organiseres der et lærerråd, lærermøde og samarbejdsudvalg efter regler, fastsat af Skúlafyrisitingin.
Stk. 2. Hvis gymnasium og HF-kursus huses sammen, nedsættes der et fælles lærerråd.

§ 19. På hvert HF-kursus organiseres et

næmingaráð, sum næmingarnir velja síná millum eftir reglum, ið Skúlafyrisitingin ásetur.
Stk. 2. Næmingaráðið gevur ummæli til rektaran/skeiðleiðaran, herundir í almennum málum viðvíkjandi næmingaviðurskiftum.
Stk. 3. Næmingaráðið á hvørjum HF-skeiði ásetur sjálvt sína starvsskipan.
Stk. 4. Um studentaskúli og HF-skeið eru undir somu lon, verður skipað eitt felags næmingaráð.

elevråd, som bliver valgt blandt eleverne efter regler, fastsat af Skúlafyrisitingin.
Stk. 2. Elevrådet afgiver udtalelse til rektor/kursusleder, herunder i generelle sager angående elevforhold.
Stk. 3. Elevrådet på hvert HF-kursus fastsætter selv sin forretningsorden.
Stk. 4. Hvis gymnasium og HF-kursus huses sammen, nedsættes der et fælles elevråd.

§ 20. Landsstýrið hevur hægstu ábyrgd av undirvísing og prøvtøku á HF-skeiðunum, og Skúlafyrisitingin hevur eftirlitið.
Stk. 2. Skúlafyrisitingin kann sambært stk. 1 krevja allar upplýsingar viðvíkjandi skeiðunum, heruppí eisini stíla fyri vitjan á skeiðunum.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin ásetur reglur fyri innsavning av upplýsingum frá skeiðunum.

§ 20. Landsstyret har det overordnede ansvar for undervisning og eksamen på HF-kurserne, medens Skúlafyrisitingin har tilsynet.
Stk. 2. Skúlafyrisitingin kan i henhold til stk. 1 kræve alle oplysninger vedrørende kurset, herunder arrangere besøg på kurset.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin fastsætter regler for indsamling af oplysninger fra kurserne.

Kapittul 8
Lærarar

§ 21. Landsskúlaráðið setir í starv og loysir úr starvi lærarar. Setan og uppsøgn fer fram eftir tilmæli frá rektaranum-/skeiðleiðaranum.
Stk. 2. Setan sum adjunktur, lektari ella rektari/skeiðleiðari á HF-skeiði er treytað av, at viðkomandi í lærugreinarøðini, nevnd í § 2, stk. 1, hevur lokið kandidatprógv ella magistarakonferens á einum universiteti ella universitetssentri. Landsstýrið ásetur reglur um fakligan førleika fyri setan. Landsstýrið kann góðkenna, at umsøkjari, ið hevur lokið javnbjóðis prógv á øðrum hægri lærustovni, verður settur í omanfyri nevndu størv.
Stk. 3. Setan í fast starv sum lærari ella rektari/skeiðleiðari á HF-skeiði er treytað av, at viðkomandi hevur staðið prøvtøku í

Kapitel 8
Lærere

§ 21. Lærere ansættes og afskediges af Landsskúlaráðið. Ansættelse og afskedigelse sker efter indstilling fra rektor/kursuslederen.
Stk. 2. Ansættelse som adjunkt, lektor eller rektor ved HF-kurset er betinget af, at vedkommende indenfor fagrækken, nævnt i § 2, stk. 1, har bestået kandidateksamen eller magisterkonferens ved et universitet eller et universitetscenter. Landsstyret fastsætter regler om faglige kvalifikationer for ansættelse. Landsstyret kan godkende, at ansøgere, der har afsluttet tilsvarende eksamen fra anden højere læreanstalt, kan ansættes i ovennævnte stillinger.
Stk. 3. Ansættelse i fast stilling som lærer eller rektor/kursusleder ved HF-kursus er

ástøðiligari og verkligari námsfrøði, umfram tikið lut í fakligum- námsfrøðiligum skeiði.

Stk. 4. Skúlafyrisitingin gevur lærarum undirvísingarførleika í einari ella fleiri lærugreinum sambært reglunum í stk. 1 og 2.

Stk. 5. Landsstýrið ásetur reglur um ástøðiligt og verkligt námsfrøðiligt skeið, eins og reglur um atgongd til at taka samlað námsfrøðiligt skeið.

Stk. 6. HF-skeiðini hava skyldu eftir ávísing frá Skúlafyrisitingini at taka lærarakandidatar, ið skulu taka verkligt námsfrøðiligt skeið.

betinget af, at vedkommende har bestået prøve i teoretisk og praktisk pædagogikum, samt deltaget i fagligt pædagogisk kursus.

Stk. 4. Skúlafyrisitingin tildeler lærere undervisningskompetence i et eller flere fag i henhold til reglerne i stk. 1 og stk. 2.

Stk. 5. Landsstyret fastsætter regler om teoretisk og praktisk pædagogikum, samt regler om adgang til at tage et samlet pædagogikum.

Stk. 6. HF-kurserne har pligt til efter anvisning fra skúlafyrisitingin at modtage lærerkandidater, der skal tage praktisk pædagogikum.

Kapittul 9
Fígging

§ 22. Landsstýrið rekur HF-skeiðini.

Stk. 2. Studningur kann verða veittur til royndar- og menningarvirksemi, eftirútbúgving, útbúgving av lestrarvegleiðarum og faklig skeið.

§ 23. Fulltíðarundirvísingin á HF-skeiðunum er ókeypis fyri næmingarnar.

Stk. 2. Næmingarnir skulu sjálvir útvega sær bøkur og annað undirvísingartilfar.

Stk. 3. Skúlafyrisitingin kann heimila skeiðunum at taka gjald fyri ljóstøk til nýtslu í undirvísingini.

Stk. 4. Skúlafyrisitingin kann áseta reglur um, at næmingar á lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvising fyri tilkomin skulu lata eitt gjald fyri hvørja lærugrein sær og um gjaldsupphædd og gjaldsskipan.

Stk. 5. Landsstýrið ásetur reglur um, at næmingar, ið ynskja at innstilla seg til prógvtøku, uttan at teir eru innskrivaðir til undirvísing (sjálvlesandi), skulu lata eitt gjald.

Stk. 6. Inngjaldingin eftir stk. 4 og 5 er ein treyt fyri at fáa undirvísing og fara til prógvtøku.

Kapitel 9
Financiering

§ 22. Landsstyret driver HF-kurserne.

Stk. 2. Støtte kan ydes til forsøgs- og udviklingsarbejde, efteruddannelse, uddannelse af studievejledere og faglige kurser.

§ 23. Fuldtidsundervisningen på HF-kurserne er vederlagsfri for eleverne.

Stk. 2. Eleverne skal selv anskaffe sig bøger og andet undervisningsmateriale.

Stk. 3. Skúlafyrisitingin kan give skolerne hjemmel til at tage betaling for fotokopier, der benyttes i undervisningen.

Stk. 4. Skúlafyrisitingin kan fastsætte regler om, at elever til studieforberedende enkeltfagsundervisning for voksne skal betale et gebyr for hvert enkelt fag, samt kursusafgift og betalingsordning.

Stk. 5. Landsstyret fastsætter regler om, at elever, der ønsker at indstille sig til eksamen, uden at de er indskrevet til undervisning (selvstuderende), skal betale et gebyr.

Stk. 6. Indbetalingen iflg. stk. 4 og stk. 5 er en betingelse for at få undervisning og gå til eksamen.

Kapittul 10
Ymiskar ásetingar

§ 24. Landsstýrið kann í serligum førum ásæta reglur um frávik frá ásetingini í hesi lóg, fyri at fremja royndar- og menningarvirksemi. Royndar- og menningarvirksemi má ikki minka um næminganna møguleikar at nýta teirra útbúgving sum støði undir hægri framhaldslestri ella rættindi teirra í øðrum førum.

Stk. 2. Landsstýrið kann áseta reglur um frávik frá ásetingunum í hesi lóg, um eitt skeið bjóðar fram undirvísing, ið miðar ímóti einum samsvarandi altjóðaprógvi, ið gevur atgongd til hægri framhaldslestur á jøvnum føti við HF-prógvtøku.

§ 25. Kæra yvir avgerð rektarans/skeiðleiðarans í námsfrøðiligum málum og málum, sum viðvíkja næmingum sambært § 17, stk. 3, kann innan 5 dagar eftir, at avgerðin er kunngjørd næminginum, leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum, ið landsstýrið ásetur. Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Kapittul 11
Gildi o.a.

§ 26. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Lógin er fyrstu ferð at nýta fyri teir næmingar, sum byrja HF-útbúgving aftaná 1. august 1995.

Stk. 2. Samstundis fer løgtingslóg nr. 22 frá 23. apríl 1976 um hægri fyrireikingarprógvtøku úr gildi, tó soleiðis, at reglurnar framvegis eru galdandi til endan av skúlaárinum 1995/96 fyri næmingar, sum eru byrjaðir HF-útbúgving áðrenn 1. august 1995.

Kapitel 10
Forskellige bestemmelser

§ 24. Landsstyret kan i særlige tilfælde fastsætte regler om undtagelser fra bestemmelserne i denne lov, for at fremme forsøgs- og udviklingsarbejdet. Forsøgs- og udviklingsarbejdet må ikke forringe elevernes muligheder for at benytte deres uddannelse som grundlag for videregående studier eller deres rettigheder i anden henseende.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om at fravige bestemmelserne i denne lov, hvis et kursus tilbyder undervisning, der sigter mod en tilsvarende international eksamen, der giver adgang til fortsatte videregående studier på lige fod med HF-eksamen.

§ 25. Klage over rektors/kursusleders afgørelse i pædagogiske spørgsmål og sager, der vedrører elever i henhold til § 17, stk. 3, kan inden 5 dage efter, at afgørelsen er bekendtgjort for eleven, indbringes for Skúlafyrisitingin efter regler, fastsat af landsstyret. Skúlafyrisitingin's afgørelse kan ikke indbringes for højere administrativ myndighed.

Kapitel 11
Ikrafttræden m.v.

§ 26. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort. Loven omfatter også elever, der påbegynder HF-uddannelse efter 1. august 1995.

Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 22 af 23. april 1976 om højere forberedelsesexamen, dog således, at reglerne fortsat er gældende til slutningen af skoleåret 1995/96 for elever, der har påbegyndt HF-uddannelse før 1. august 1995.

Viðmerkingar:

Sama grundarlag, sum varð nýtt í sambandi við gerð av uppskoti til nýggja studentaskúlalóg, varð nýtt í sambandi við gerð av uppskoti til nýggja HF-lóg.

Í arbeiðssetninginum var tilskilað, at HF-útbúgvingin skuldu vera fyri tilkomin fólk, tí talan er um eina tvey ára útbúgving, sum krevur, at næmingarnir eru meira búnir. Eisini varð hildið, at útbúgvingartilboðið til tey, sum koma beinleiðis úr fólkaskúlanum, er nóg stórt, nú vit hava fingið útbygt handilsskúlarnar (HHS + HH) og teknisku skúlarnar (SHT + HT).

Tá nýggja danska HF-lóggávan varð sett í gildi í 1991, varð táttað í viðvíkjandi upptøku av næmingum beinleiðis úr 10. flokki. Krav varð sett um, at næmingarnir skuldu hava víðkaði fráfaringarroynd fólkaskúlans í donskum - og í tveimum av lærugreinunum: enskum, týskum ella fronskum. Umframt hetta skuldi fráfaringarskúlin vátta, at næmingurin var skikkaður.

Arbeiðsbólkurin viðgjørdi donsku HF-skipanina gjølla, og gjørdi síðani av, at av tí at talan var um tilkomið fólk í Føroyum (hetta merkir 18½ ár tá tey byrja í 1. HF), kundi týskt avtakast sum upptøkutreyt, umframt at vit bert krevja víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans í føroyskum og donskum, og fráfaringarroynd fólkaskúlans í støddfrøði og enskum. Við hesum er latið upp fyri, at tey, sum av ymiskum orsøkum ikki hava valt týskt í framhaldsdeildini, kortini kunnu fara undir HF-útbúgving, uttan fyrst at taka týskt á 9. floks støði.

Av tí at HF-útbúgvingin bert tekur 2 ár, gevur hon ikki sama støði í vallærugreinunum, sum ein 3 ára útbúgving. Møguleiki er tó fyri næmingar, sum vilja tað, at taka lærugreinir á hástigi, studentaskúlastigi, um so er, at hetta er neyðugt fyri at sleppa inn á hægri lærustovn.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

ad § 1: Greinin tilskilar, at talan er um bæði eina almennandi og eina lestrarfyrireikandi undirvísing fyri tilkomin, herundir stakgreinalestur.

§ 2: Tilskilað verður í greinini, hvørjar lærugreinirnar eru, sum tilsamans mynda eina HF-útbúgving.

ad § 3: HF-útbúgvingin fevnir um felagslærugreinir og eitt ávíst tal av vallærugreinum. HF-útbúgvingin kann setast ymiskt saman viðvíkjandi vallærugreinum, og tað eru teir hægru upptøkustovnarnir, sum ásetta krøvini um ávísar vallærugreinir og á hvørjum stigi hesar skulu vera, fyri at umsøkjarin kann verða tikin upp. Í kunngerð verður nærri ásett, hvussu býtið verður millum felagslærugreinir og vallærugreinir, og hvussu krøvini eru fyri at standa eina samlaða HF-prøvtøku. Møguleiki verður fyri at ávísar lærugreinir

úr øðrum gymnasialum útbúgvingum kunnu verða partur av einari HF-prøvtøku.

ad § 4: Um ein HF-næmingur verður noyddur at taka ávísar lærugreinir á hástigi (A-stigi) sambært studentaskúlalóggávuni fyri at verða tikin upp til bægri framhaldsútbúgving, er møguleiki fyri at stíla fyri tí sum ein partur av HF-prøvtøkuni.

ad § 5: Greinin tilskilar, at tað ber til at taka eina samlaða HF-prøvtøku sum stakgreinalesandi. Tað merkir, at tey, sum av einari ella aðrari orsøk ikki hava møguleika fyri at fylgja einum fullum skeiði, so lívandi kunnu taka tær prøvtøkur, sum tey hava brúk fyri. Tað ber eisini til at taka lærugreinir á studentaskúlastigi, um næmingurin hevur tørv á tí, við atliti at framhaldandi útbúgving.

ad § 6: Í hesi grein verður tilskilað, at landsstýrið ger nærri reglur um innihaldið av undirvísingini í lærugreinunum og á hvørjum stigi lærugreinirnar eru. Møguleiki er eisini fyri at fara til prøvtøku í einstøkum HF-lærugreinum sum sjálvlesandi.

ad § 7: Hetta greinin ásetur øll viðurskifti viðvíkjandi prøvtøku. Í hesum sambandi skal prøvtøkukunngerð gerast, sum tilskilar, hvussu mannagongdin er viðvíkjandi øllum viðurskiftum, herundir eisini kæru um prøvtøku. Kæra um avgerðir tiknar í sambandi við prøvtøku, herundir um ásetan av prøvtali, kann innan 2 dagar, aftaná at avgerðin er kunngjørd næminginum, leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum, ið landsstýrið ásetur. Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til bægri fyrisitingarligan myndugleika.

ad § 8: Eins og í øðrum útbúgvingum skulu næmingarnir hava útbúgvingar- og yrkisvegleiðing, soleiðis at teir verða betur førir fyri kvalifiserað at velja millum ymsar útbúgvingar- og vinnumøguleikar.

ad § 9: Næmingum við breki skulu bjóðast serliga undirvísing ella sernámsfrøðiliga hjálp, soleiðis at eisini teir fáa útbúgving og betri vinnumøguleikar seinni. Er talan um, at næmingur gerst sjúkur í einum samanhangandi tíðarskeiði, skal møguleiki vera fyri at bjóða viðkomandi eina ávísa hjálp, so hann verður førur fyri at fylgja undirvísingini, tá ið hann gerst frískur.

ad § 10: Skotið verður upp, at treytin fyri at verða tikin upp á HF-skeið er, at umsøkjarin er fyltur 19 ár áðrenn 31. desember í tí ári hann byrjar undirvísingina, og at umsøkjarin hevur gingið 10 ár í skúla og lokið víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans í føroyskum og donskum og fráfaringarroynd fólkaskúlans í lærugreinunum støddfrøði og enskum. Møguleiki er fyri at gera undantøk frá regluni í stk. 1, nr. 2 um rektarin/skeiðleiðarin metir, at viðkomandi er førur fyri at fylgja undirvísingini og taka HF-prógv eftir vanligari tíð.

ad § 11: Stakgreinalesandi skulu í teimum einstøku lærugreinunum lúka tey somu krøvini sum fullskeiðsnæmingar.

ad § 12: Greiniliga verður her ásett, at rektarin/skeiðsleiðarin tekur støðu til, um ein

HF-næmingur er førur fyri fakliga at taka eina lærugrein á gymnasialum hástigi (A-stigi).

ad § 14: Møguleiki er fyri, at studentaskúlar og HF-skeið kunnu stíla fyri t.d. stakgreinaundirvísing aðrastaðni enn á studentaskúla/HF-skeiði, um tørvur er fyri tí. Samstarv við t.d. aðrar skúlar um ymisk viðurskifti í sambandi við undirvísing er ein møguleiki.

ad § 15: Skotið verður upp, at umsøkjarar, sum lúka krøvini um upptøku, skulu takast upp, og at landsstýrið tryggjar skeiðrúmd. Um eitt skeið ikki hevur undirvísing í einari lærugrein, ið krevst fyri at sleppa inn á hægri framhalslestur, kann einum skeiði verða álagt at skipa fyri undirvísing í hesi lærugrein. Landsstýrið skal áseta nærri reglur um hetta.

ad § 16: Tilskilað verður, at landsstýrið er tann myndugleiki, ið setur í starv og loysir úr starvi rektara/skeiðleiðara.

ad § 17: Tilskilað verður, at rektarin/skeiðleiðarin hevur høvuðsábyrgdina av HF-skeiðinum. Tað er neyðugt greitt at tilskila, at tað bert er rektarin/skeiðleiðarin, ið hevur rætt og skyldu at útinna ávísar funktiónir á skeiðinum. Millum annað í sambandi við, at farið verður yvir til mál- og rammustýring, er tað umráðandi, at ábyrgdin verður greitt tilskilað.

ad §§ 18 og 19: Eitt HF-skeið er ein heild, og tí mugu allar funktiónir, herundir lærararáð og næmingaráð, ið boyra heima á HF-skeiðinum, tilskilast í lógini. Ásett er, at um HF-skeið og studentaskúli eru undir somu lon, verður bert eitt felags lærararáð og eitt felags næmingaráð skipað.

ad § 20: Tá ið løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting varð gjørd, varð serliga hugsað um fólkaskúlan. HF-skeið eru eins og studentaskúlar øðrvísi og hava ein annan bygnað og eitt annað innihald enn fólkaskúlar. Hígartil hevur meginparturin av lógargargrundarlagnum verið danskt. Skotið verður upp at gera føroyskt lógargrundarlag, ið tekur hædd fyri viðurskiftunum á HF-skeiðunum. Greinin ásetur, at landsstýrið hevur hægstu ábyrgdina av undirvísingini og prøvtøkuni á HF-skeiðnum.

ad § 21: Í hesi grein eru øll viðurskifti viðvíkjandi lærarum við studentaskúlar tilskilað, herundir førleikakrøv - bæði fakliga og námsfrøðiliga.

ad § 22: Ásett er, at tað er landsstýrið, sum rekur HF-skeiðini.

ad § 23: Skotið verður upp, at undirvísingin verður ókeypis fyri næmingarnar, samstundis sum lógarheimild verður fyri, at næmingarnir á HF-skeiðunum sjálvir skulu útvega sær bøkur og annað undirvísingartilfar. Hígartil hevur tað ikki verið tilskilað nakrastaðni, men praksis hevur verið so. Skotið verður upp, at heimild verður fyri at

taka gjald fyri ljóstøk, sum nýtt verða í undirvísingini.

§ 24: Tað skal vera møgnligt at gera frávik frá reglunum í hesi lóg, men eitt frávik má á ongan hátt minka um møgulcikarnar hjá næmingunum at halda fram í hægri framhaldslestri.

ad § 25: Skotið verður upp, at avgerðir rektarans í námsfrøðiligum málum og málum, sum viðvíkja næmingum sambært § 17, stk. 3, innan 5 dagar eftir at avgerðin er kunngjørd næminginum, kunnu leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum, ið landsstýrið ásetir. Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

§ 26: Skotið verður upp, at lógin verður at nýta fyrstu ferð fyri teir næmingar, sum byrja HF-útbúgving aftaná 1. august 1995. Í stk. 2 eru gjørdar skiftisreglur fyri næmingar, sum byrjaðu HF-útbúgving áðrenn 1. august 1995.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Landsstýrinum tann 18. apríl 1995.

Við 1. viðgerð tann 24. apríl 1995 varð málið beint í mentannar- og skúlanevndina.

Mentannar- og skúlanevndin hevur viðgjørt málið. Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti Landsstýrisins, tó mælir nevndin til, at í grein 10, stk. 1 pkt. 1, ið er soljóðandi:

"Umsøkjarin er fyltur 19 ár áðrenn 31. desember í tí ári, hann byrjar undirvísingina, og," verður strikað. Tí verður í grein 10 stk 1 "2") eisini strikað.

Samsvarandi hesum setir **ein samd nevnd** fram fylgjandi:

Broytingaruppskot

§ 10 stk. 1, pkt 1 verður strikað.	§ 10 stk. 1, pkt. 1 udgår.
Í § 10, stk. 1 verður "2" verður.	I § 10, stk. 1 udgår "2".

Ein minniluti (Jógvan A. Johannesen og Signar á Brúnni) tekur ikki undir við grein 13 sum er soljóðandi:

"Landsstýrið kann seta á stovn og leggja niður HF-skeið. Verður HF-skeið niðurlagt, skal avtøkuskipan gerast samstundis".

Minnilutin setir tí fram fylgjandi

Broytingaruppskot

§ 13 verður strikað.

§ 13 udgår.

2. viðgerð 29. mai 1995. Broytingaruppskotið frá minnilutanum fall við 14-0 atkvøðum. Málið fall við 14-0 atkvøðum.

97 Løgtingslóg um studentaskúlar v.m.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um studentaskúlar v.m.

Kapittul 1
Studentaskúlar v.m.

§ 1. Føroya Studentaskúli og HF-skeið og Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy eru stovnar undir landsstýrinum.
Stk. 2. Eftir avgerð landsstýrisins kunnu deildir av Føroya Studentaskúla og HF-

lagtingslov om gymnasier m.m.

Kapitel 1
Gymnasier m.m.

§ 1. Færøernes Gymnasium og HF-kursus og Gymnasiet og HF-kurset i Eysturoy er institutioner under landsstyret.
Stk. 2. Efter landsstyrets afgørelse kan der oprettes og nedlægges afdelinger af

skeiði og deildir av Studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Eysturoynni setast á stovn og leggjast niður.

§ 2. Landsstýrið kann stovna og leggja niður studentaskúlar. Verður studentaskúli lagdur niður, skal avtøkuskipan gerast samstundis.

§ 3. Næmingagøkið hjá studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Eysturoy er Norðoyggjar, Eysturoy og tann parturin av Streymoynni, ið fevnir um Haldórsvíkar, Saksunnar, Hvalvíkar og Hósvíkar kommunur.
Stk. 2. Næmingagøkið hjá Føroya Studentaskúla-og HF-skeiði er tann parturin av Føroyum, sum ikki er nevndur í stk. 1.
Stk. 3. Landsstýrið kann áseta reglur um annað næmingagøki enn frammanfyri tilskilað.
Stk. 4. Skúlafyrisitingin kann, um serlig viðurskifti gera tað neyðugt, býta næmingar millum økini, sum nevnd eru í stk. 1 og stk. 2.

§ 4. Felagsbýtisnevnd verður sett fyri studentaskúlarnar og HF-skeiðini sambært reglum, sum Skúlafyrisitingin ger fyri býtisnevndina.

Kapittul 2
Studentaskúlaútbúgvingin

§ 5. Studentaskúlin gevur eina undirvísing, sum er grundað á undirvísingina í 9. flokki í fólkaskúlanum. Hon tekur 3 ár, er almennandi og gevur neyðugt grundarlag fyri hægri framhaldslestri. Útbúgvingin endar við studentspróvtøku eftir nærri reglum, ið landsstýrið ásetur.

§ 6. Undirvísingin verður skipað við

Færøernes Gymnasium og HF-kursus og afdelinger af Gymnsiet og HF-kurset i Eysturoy.

§ 2. Landsstyret kan oprette og nedlægge gymnasier. Hvis et gymnasium nedlægges, skal der samtidig udarbejdes en afviklingsplan.

§ 3. Elevområdet for gymnasiet og HF-kurset på Eysturoy er Norðoyggjar, Eysturoy og den del af Streymoy, som omfatter Haldórsvík, Saksun, Hvalvík og Hósvík kommuner.
Stk. 2. Elevområdet for Færøernes Gymnasium og HF-kursus er den del af Færøerne, som ikke er nævnt i stk. 1.
Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte regler om andet elevområde end foran anført.
Stk. 4. Skúlafyrisitingin kan, såfremt særlige forhold gør det nødvendigt, fordele elever mellem områderne, der er nævnt i stk. 1 og stk. 2.

§ 4. Der nedsættes et fælles fordelings nævn for gymnasierne og HF-kurserne ifølge regler, som Skúlafyrisitingin udfærdiger for fordelingsnævnet.

Kapitel 2
Gymnasieuddannelsen

§ 5. Gymnasiet giver en undervisning, der bygger på undervisningen i 9. klasse i folkeskolen. Den varer i 3 år, er almentdannende og giver det nødvendige grundlag for højere, videregående studier. Uddannelsen afsluttes med studentereksamen efter nærmere regler, fastsat af landsstyret.

§ 6. Undervisningen lægges til rette på 2

tveimum deildum, einari málsligari og einari støddfrøðiligari. Undirvísingin kann eisini verða skipað sum stakgreinalestur eftir nærri reglum, ið landsstýrið ásetur.

Stk. 2. Lærugreinirnar verða skipaðar sum felagslærugreinir, deildarlærugreinir, vallærugreinir á hástigi og vallærugreinir á miðstigi.

Stk. 3. Lærugreinirnar eru: alisfrøði, alisfrøði-evnafrøði, danskt, enskt, evnafrøði, evning, films- og sjónvarpskunnleiki, fiskivinna, fornaldarfrøði, franskt, føroyskt, geografi, grikskt, heimspeki, ítróttur, latín, lívfrøði, religión, russiskt, sálarfrøði, samfelagsfrøði, spanskt, støddfrøði, søga, teldufrøði, tónleikur, týskt, tøkni, vinnulívsbúskapur. Næmingarnir skuln harumframt hava útbúgvingar- og yrkisvegleiðing.

Stk. 4. Landsstýrið kann áseta reglur um, at undirvísing verður givin í øðrum lærugreinum.

Stk. 5. Umframt felagslærugreinir, deildarlærugreinir og vallærugreinir á miðstigi, skal einstaki næmingurin taka í minsta lagi 2 vallærugreinir á hástigi.

Stk. 6. Landsstýrið ásetur reglur um samansetting av vallærugreinum.

Stk. 7. Landsstýrið ásetur reglur um undirvísingina, herímillum:

1) vavið og innihaldið í teimum einstøku lærugreinunum,
2) hvar í skipanini lærugreinin verður lisin,
3) um lærugreinin verður lisin sum felagslærugrein, deildarlærugrein ella vallærugrein,
4) undirvísingarstigið í tí einstøku lærugreinini og
5) minstu krøv viðvíkjandi tali og samansetting av vallærugreinum hjá einstaka næminginum.

Stk. 8. Landsstýrið kann áseta reglur um, at ávísar vallærugreinir skulu lesast á teimum einstøku skúlunum.

Stk. 9. Brekaðir næmingar fáa serliga

liniet, en sproglig og en matematisk. Undervisningen kan også lægges til rette som enkeltfagsundervisning efter nærmere regler, fastsat af landsstyret.

Stk. 2. Fagene tilrettelægges som fællesfag, liniefag, valgfag på højniveau og valgfag på mellemniveau.

Stk. 3. Fagene er: Fysik, fysik-kemi, dansk, engelsk, kemi, billedkunst, film- og fjernsynskundskab, fiskeri, oldtidskundskab, fransk, færøsk, geografi, græsk, filosofi, idræt, latin, biologi, religion, russisk, psykologi, samfundsfag, spansk, matematik, historie, datalogi, musik, tysk, teknologi og erhvervsøkonomi. Eleverne skal desuden have uddannelses og erhvervsvejledning.

Stk. 4. Landsstyret kan fastsætte regler om, at der gives undervisning i andre fag.

Stk. 5. Foruden fællesfag, liniefag og valgfag på mellemniveau, skal den enkelte elev tage 2 valgfag på højniveau.

Stk. 6. Landsstyret fastsætter regler om sammensætning af valgfag.

Stk. 7. Landsstyret fastsætter regler om undervisningen, deriblandt

1) omfang og indhold for de enkelte fag,
2) fagets indplacering i ordningen,
3) om faget læses som fællesfag, liniefag eller valgfag,
4) undervisningsniveauet i det enkelte fag,
5) minimumskrav vedrørende antal og sammensætning af valgfag for den enkelte elev.

Stk. 8. Landsstyret kan fastsætte regler om, at bestemte valgfag skal læses på de enkelte skoler.

Stk. 9. Handicappede elever får særlig undervisning eller specialpædagogisk hjælp efter regler, fastsat af Skúlafyrisitingin.

Stk. 10. For elever, som på grund af sygdom ikke kan følge den sædvanlige undervisning i skolen gennem længere tid, iværksættes der sygeundervisning efter regler, fastsat af landsstyret.

undirvísing ella sernámsfrøðiliga hjálp eftir reglum, ið Skúlafyrisitingin ásetur.
Stk. 10. Fyri næmingar, sum vegna sjúku ikki kunnu fylgja vanligu undirvísingini á skúlanum í longri tíð, verða undirvísingartiltøk framd eftir reglum um sjúkraundirvísing, ið landsstýrið ásetur.
Stk. 11. Einstaka næminginum verður boðin útbúgvingar- og yrkisvegleiðing eftir reglum, ið landsstýrið ásetur.

§ 7. Landsstýrið ásetur gjøllari reglur fyri studentsprøvtøku, herundir um krøv og prøvtøkuuppgevingar, prøvtøkur, prøvdøming, prøvtøl og ummæli.
Stk. 2. Kæra um avgerðir tiknar í sambandi við prøvtøku, herundir um áseting av prøvtali, kann innan 2 dagar aftaná at avgerðin er kunngjørd næminginum leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum, ið landsstýrið ásetur. Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

§ 8. Ein studentaskúli kann geva undirvísing í lærugreinum innan aðrar gymnasialar útbúgvingar eftir reglum, ið landsstýrið ásetur.

Kapittul 3
Upptøka

§ 9. Upptøka í 1. studentaskúlaflokk er treytað av, at næmingurin hevur lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans, og at hann eftir meting fráfaringarskúlans er førur fyri at fylgja undirvísingini í studentaskúlanum á nøktandi hátt og til ásettu tíð.
Stk. 2. Landsstýrið ásetur gjøllari reglur um og treytir fyri upptøku í 1. studentaskúlaflokk og til stakgreinalestur, og um, í hvørjum føri næmingur, sum ikki lýkur krøvini í stk. 1, kann verða tikin upp.
Stk. 3. Umsøkjarar, ið lúka upptøku-

Stk. 11. Den enkelte elev tilbydes uddannelses- og erhvervsvejledning, efter regler, fastsat af landsstyret.

§ 7. Landsstyret fastsætter nærmere regler om studentereksamen, herunder om fordringer og pensumopgivelser, eksaminer, censur, karakterer og vidnesbyrd.
Stk. 2. Klage over afgørelser, truffet i forbindelse med eksamen, herunder fastsættelse af karakter, kan inden 2 dage efter, at afgørelsen er bekendtgjort for eleven, indbringes for Skúlafyrisitingin efter regler, fastsat af landsstyret. Skúlafyrisitingin's afgørelser kan ikke indbringes for højere administrativ myndighed.

§ 8. Et gymnasium kan give undervisning i fag til andre gymnasiale uddannelser efter regler fastsat af landsstyret.

Kapitel 3
Optagelse

§ 9. Optagelse i 1. gymnasieklasse er betinget af, at eleven har afsluttet folkeskolens afgangsprøve, og at han ifølge afgangsskolens vurdering er i stand til at følge undervisningen på gymnasiet på tilfredsstillende måde og på normal tid.
Stk. 2. Landsstyret fastsætter nærmere regler og betingelser for optagelse til 1. gymnasieklasse og til enkeltfagundervisning og om, i hvilket tilfælde elever, der ikke opfylder betingelserne i stk. 1, kan optages.

krøvini sambært stk. 1 og 2, skulu verða tiknir upp.
Stk. 4. Landsstýrið tryggjar, at studentaskúlarúmd er tøk, soleiðis at umsøkjarar, nevndir í stk. 3, kunnu verða tiknir upp.

Kapittul 4
Leiðsla

§ 10. Landsstýrið setur í starv og loysir úr starvi rektara.

§ 11. Rektarin er dagligi leiðari skúlans og hevur ábyrgdina av virksemi skúlans mótvegis landsstýrinum.
Stk. 2. Rektarin hevur námsfrøðiligu ábyrgdina av undirvísingini og prógtøkunum á skúlanum mótvegis Skúlafyrisitingini.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin kann geva rektaranum boð í námsfrøðiligum málum.
Stk. 4. Rektarin leiðir og býtir arbeiðið millum lærarar og starvsfólk á skúlanum og tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingunum, herímillum um upptøku av næmingum.
Stk. 5. Rektarin heldur prógtøku og skrívar prógvini.

§ 12. Á hvørjum studentaskúla verður skipað lærararáð, lærarafundur og samstarvsnevnd eftir reglum, ið Skúlafyrisitingin ásetur.

§ 13. Á hvørjum skúla verður skipað næmingaráð, sum næmingarnir velja sínámillum eftir reglum, ið Skúlafyrisitingin ásetur.
Stk. 2. Næmingaráðið gevur ummæli til rektaran, herundir í almennum málum viðvíkjandi næmingaviðurskiftum.
Stk. 3. Næmingaráðið á hvørjum skúla ásetur sjálvt sína starvsskipan.

Stk. 3. Ansøgere, der opfylder optagelsesbetingelserne i henhold til stk. 1 og 2, skal optages.
Stk. 4. Landsstyret sikrer, at der er gymnasiekapacitet til rådighed, således at de ansøgere, der er nævnt i stk. 3, kan optages.

Kapitel 4
Ledelse

§ 10. Landsstyret ansætter og afskediger rektor.

§ 11. Rektor er skolens daglige leder og har ansvaret af gymnasiets virksomhed overfor landsstyret.
Stk. 2. Rektor har det pædagogiske ansvar for undervisningen og eksaminer på skolen overfor Skúlafyrisitingin.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin kan give rektor pålæg i pædagogiske spørgsmål.
Stk. 4. Rektor leder og fordeler arbejdet mellem lærere og personale på skolen og tager alle konkrete afgørelser vedrørende elever, herunder optagelse af elever.
Stk. 5. Rektor afholder eksamen og udsteder eksamensbevis.

§ 12. Ved hvert gymnasium organiseres der et lærerråd, lærermøde og samarbejdsudvalg efter regler, fastsat af Skúlafyrisitingin.

§ 13. På hver skole organiseres et elevråd, som bliver valgt blandt eleverne efter regler, fastsat af Skúlafyrisitingin.
Stk. 2. Elevrådet afgiver udtalelse til rektor, herunder i generelle sager angående elevforhold.
Stk. 3. Elevrådet på hver skole fastsætter selv sin forretningsorden.

Kapittul 5
Lærarar

§ 14. Landsskúlaráðið setir og loysir úr starvi lærarar. Setan og uppsøgn fer fram eftir tilmæli frá rektaranum.

Stk. 2. Setan sum adjunktur, lektari ella rektari við studentaskúla er treytað av, at viðkomandi innan lærugreinarøðina í studentaskúlanum hevur lokið kandidatprógv ella magistarakonferens á einum universiteti ella universitetssentri. Landsstýrið ásetur reglur um fakligan førleika fyri setan. Landsstýrið kann góðkenna, at umsøkjari, sum hevur lokið javnbjóðis prógv á øðrum hægri lærustovni, verður settur í omanfyri nevndu størv.

Stk. 3. Setan í fast starv sum lærari ella rektari við studentaskúla er treytað av, at viðkomandi hevur staðið prøvtøku í ástøðiligari og verkligari námsfrøði, umframt at hava tikið lut í fakligum-námsfrøðiligum skeiði.

Stk. 4. Skúlafyrisitingin gevur lærarum undirvísingarførleika í einari ella fleiri lærugreinum sambært reglunum í stk. 1 og 2.

Stk. 5. Landsstýrið ásetur reglurnar um ástøðiligt og verkligt námsfrøðiligt skeið, eins og reglur um atgongd til at taka samlað námsfrøðiligt skeið.

Stk. 6. Allir studentaskúlar hava skyldu eftir ávísing frá Skúlafyrisitingini at taka lærarakandidatar, ið skulu taka verkligt námsfrøðiligt skeið.

Kapitel 5
Lærere

§ 14. Lærere ansættes og afskediges af Landsskúlaráðið. Ansættelse og afskedigelse sker efter indstilling fra rektor.

Stk. 2. Ansættelse som adjunkt, lektor eller rektor ved et gymnasium er betinget af, at vedkommende indenfor gymnasiets fagrække har bestået kandidateksamen eller magisterkonferens ved et universitet eller et universitetscenter. Landsstyret fastsætter regler om faglige kvalifikationer for ansættelse. Landsstyret kan godkende, at ansøgere, der har afsluttet en tilsvarende eksamen fra anden højere læreanstalt, kan ansættes i ovennævnte stillinger.

Stk. 3. Ansættelse i fast stilling som lærer ved gymnasium er betinget af, at vedkommende har bestået eksamen i teoretisk og praktisk pædagogikum, samt deltaget i fagligt-pædagogisk kursus.

Stk. 4. Skúlafyrisitingin tildeler lærere undervisningskompetence i et eller flere fag i henhold til reglerne i stk. 1 og 2.

Stk. 5. Landsstyret fastsætter regler om teoretisk og praktisk pædagogikum, samt regler om adgang til at tage et samlet pædagogikum.

Stk. 6. Alle gymnasier har pligt til efter anvisning fra Skúlafyrisitingin at modtage lærerkandidater, der skal tage praktisk pædagogikum.

Kapittul 6
Fígging

§ 15. Landsstýrið rekur studentaskúlarnar.

Stk. 2. Studningur kann verða veittur til royndar- og menningarvirksemi, eftirútbúgving, útbúgving av lestrarvegleiðarum og faklig skeið.

Kapitel 6
Finansiering

§ 15. Landsstyret driver gymnasierne.

Stk. 2. Støtte kan ydes til forsøgs og udviklingsarbejde, efteruddannelse, uddannelse af studievejledere og faglige kurser.

§ 16. Undirvísingin á studentaskúlunum er ókeypis fyri næmingarnar.
Stk. 2. Næmingarnir skulu sjálvir útvega sær bøkur og annað undirvísingartilfar.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin kann heimila skúlunum at taka gjald fyri ljóstøk til nýtslu í undirvísingini.

§ 17. Landsstýrið kann áseta reglur um, at næmingur kann fáa styrk til undirvísing uttan fyri Norðurlond, sum miðar ímóti einum samsvarandi altjóðaprógvi, ið gevur atgongd til hægri framhaldslestur á jøvnum føti við studentsprógv. Styrkurin kann svara til meðalútreiðslunar fyri ein næming á føroyskum studentaskúla.

Kapittul 7
Ymiskar ásetingar

§ 18. Landsstýrið kann í serligum førum áseta reglur um frávik frá hesi lóg, til tess at fremja royndar- og menningarvirksemi. Royndar- og menningarvirksemið má ikki minka um næminganna møgulcikar at nýta teirra útbúgving sum støði undir hægri framhaldslestri ella rættindi teirra í øðrum førum.
Stk. 2. Landsstýrið kann áseta reglur um frávik frá ásetingunum í hesi lóg, um ein studentaskúli bjóðar fram undirvísing, ið miðar ímóti einum samsvarandi altjóðaprógvi, sum gevur atgongd til hægri framhaldslestur á jøvnum føri við studentsprógv.

§ 19. Kærur yvir avgerðir rektarans í námsfrøðiligum málum og málum, sum viðvíkja næmingum sambært § 11, stk. 4, kunnu innan 5 dagar eftir, at avgerðin er kunngjørd næminginum, leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum, ið landsstýrið ásetur. Avgerðin hjá Skúla-

§ 16. Undervisningen på gymnasierne er vederlagsfri for eleverne.
Stk. 2. Eleverne skal selv anskaffe sig bøger og andet undervisningsmateriale.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin kan give skolerne hjemmel til at tage betaling for fotokopier, der benyttes i undervisningen.

§ 17. Landsstyret kan fastsætte regler om, at elever kan få støtte til undervisning udenfor de nordiske lande, der sigter mod at tage en tilsvarende international eksamen, der giver adgang til højere videregående studier på lige fod med studentereksamen. Støtten kan svare til gennemsnitsudgifterne for en elev på færøsk gymnasium.

Kapitel 7
Forskellige bestemmelser

§ 18. Landsstyret kan i særlige tilfælde gøre undtagelser fra denne lov, for at fremme forsøgs- og udviklingsarbejde. Forsøgs- og udviklingsarbejde må ikke forringe elevernes muligheder for at benytte deres uddannelse som grundlag for fortsatte højere videregående studier eller deres rettigheder i andre henseender.
Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om fravigelse fra bestemmelserne i denne lov, hvis et gymnasium tilbyder undervisning, der sigter mod en tilsvarende international eksamen, der giver adgang til højere videregående studier på lige fod med studentereksamen.

§ 19. Klager over rektors afgørelser i pædagogiske spørgsmål og sager, der vedrører elever i henhold til § 11, stk. 4, kan inden 5 dage efter at afgørelsen er bekendtgjort for eleven, indbringes for Skúlafyrisitingin efter regler, fastsat af landsstyret. Skúlafyrisitingin's afgørelse

fyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

§ 20. Skúlarnir kunnu stovna búdeild sambært reglum, ið Skúlafyrisitingin ásetur.

Kapittul 8
Gildi o.a.

§ 21. Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Lógin er fyrstu ferð at nýta fyri teir næmingar, sum byrja í 1. studentaskúlaflokki aftaná 1. august 1994.

Stk. 2. Samstundis fara úr gildi løgtingslóg nr. 20 frá 23. april 1976 um Føroya Studentaskúla og HF-skeið við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 76 frá 21. mai 1982 um Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy við einni broytingum og løgtingslóg nr. 21 frá 23. april 1976 um studentsprøvtøku úr gildi, tó soleiðis, at reglurnar í seinast nevndu lóg framvegis eru galdandi til endan av skúlaárinum 1995/96 fyri næmingar, sum eru tiknir inn á studentaskúla áðrenn 1. august 1994.

kan ikke indbringes for højere administrativ myndighed.

§ 20. Skolerne kan oprette kollegieenheder efter regler, fastsat af Skúlafyrisitingin.

Kapitel 8
Ikrafttrædelse

§ 21. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort. Loven omfatter de elever, som påbegyndte 1. gymnasieklasse efter 1. august 1994.

Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 20 af 23. april 1976 om Færøernes Gymnasium og HF-kursus med senere ændringer, lagtingslov nr. 76 af 21. mai 1982 om Gymnasie og HF-kursus i Eysturoy med senere ændringer og lagtingslov nr. 21 af 23. april 1976 om studentereksamen, dog således, at reglerne i sidst nævnte lov fortsat er gældende til slutningen af skoleåret 1995/96 for elever, der er optaget på gymnasium inden 1. august 1994.

Viðmerkingar:

Grundarlagið undir hesum lógaruppskoti er úrslit av tí verki, sum arbeiðsbólkur, ið landsskúlastjórin setti eftir áheitan frá landsstýrinum til at gera uppskot til nýggja studentaskúla- og HF-lóggávu, lat úr hondum. Arbeiðsbólkurin tók støði í Gula álitinum frá apríl 1990 í álitinum frá skúlanevnd løgtingsins dagfest 13. desember 1992, umframt í teimum broytingum, sum eru farnar fram innan gymnasialu skipanina í Danmark síðani seinast í 80-unum.

Endamálið við nýggju lóggávuni er at nútíðargera studentaskúla- og HF-skipanina, so at tær samsvara teimum broytingum, sum eru farnar fram í Danmark á gymnasiala økinum og teimum broytingum, sum eru gjørdar í upptøkutreytunum til hægri lærustovnar í Danmark. Fastir karmar eru settir um hesar upptøkutreytir frá 1995 (krøv um ávísar lærugreinir á ávísum stigum fyri at verða tikin inn á viðkomandi lærustovn).

Eftir gomlu studentaskúlaskipanini bar hetta ikki til. Eisini var tørvur á at dagføra innihaldið í mongum lærugreinum.

Studentaskúlaskipanin er ikki faklig burtur av, hóast stórur dentur verður lagdur á fakliga innihaldið í lærugreinunum. Hon er eisini ein almennandi útbúgving, sum skal geva næmingunum fortreytir fyri at skilja samfelagið og taka lut í demokratisku skipanini. Dentur er lagdur á at varðveita hetta sjónarmið í nýggju studentaskúlaskipanini.

Høvuðsbroytingarnar í nýggju skipanini eru, at vit nú í ávísan mun hava fingið eina valskúlaskipan, har næmingarnir í 2. og 3. s velja ávísar lærugreinir á miðstigi ella hástigi, so at teir fáa nøktað fakliga støðið hjá sær við atliti at framhaldandi lestri. Í 2. s skulu næmingarnir velja eina vallærugrein, meðan teir í 3. s skulu velja 2-4 lærugreinir. Fyri standa studentsprógv, skal næmingurin umframt allar kravdar lærugreinir eisini hava í minsta lagi tvær vallærugreinir á hástigi. Leggjast skal aftrat, at tað ber eisini til at velja nakrar skapandi lærugreinir á miðstigi í studentaskúlanum.

Í gomlu skipanini fekk næmingurin eina pakkaloysn, og tað merkir, at tá ið hann í endanum av 1. g hevði valt grein, var eingin møguleiki fyri seinni at velja eina lærugrein eftir áhuga.

Í arbeiðinum við lógaruppskotinum hevur tað verið umráðandi at tryggja, at eitt føroyskt studentsprógv gevur atgongd til hægri lærustovnar í Danmark á jøvnum føti við danskt studentsprógv - og somuleiðis eisini til hægri lærustovnar í norðurlondum og í Europa.

Stakgreinalestur.
Sum nakað nýtt ber til at taka eitt samlað studentsprógv sum stakgreinalesandi ella at taka partar av hesum. Tað merkir, at um ein lesandi hevur ynski um at taka nakrar lærugreinir, annaðhvørt av áhuga ella fyri at hækka sítt fakliga støði í einari lærugrein, kann hann fáa hesar lærugreinir á A-, B- ella C-stigi. Á henda hátt ber til hjá einum HF'ara, ið ikki í HF-útbúgvingini hevur fingið tað stæði í einari lærugrein, sum ein upptøkustovnur krevur, at bøta um sínar fakligu fortreytir. Vanliga kann hetta fara fram á tann hátt, at tann stakgreinalesandi lesur lærugreinina í einum flokki á studentaskúlanum.

Serligar viðmerkingar:

ad § 1: Skotið verður upp at varðveita Føroya Studentaskúla og HF-skeið og Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoynni í verandi líki.

ad § 2: Teir báðir studentaskúlarnir í Føroyum eru skipaðir sambært ávikavist løgtingslóg nr. 20 frá 23. apríl 1976 um Føroya Studentaskúla og HF-skeið við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 76 frá 21. mai 1982 um Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy við seinni broytingum. Skotið verður upp at geva landsstýrinum heimild til at

stovna og leggja niður studentaskúlar.

ad § 3: Sambært galdandi lóggávu er ávíst næmingaøki hjá studentaskúlunum og HF-skeiðunum. Skotið verður upp at varðveita hetta næmingaøki, tó soleiðis at landsstýrið kann ásetta reglur um annað næmingaøki enn tað, sum er ásett í lógini.

ad § 5: Í hesi grein verður tilskilað, at talan er um eina útbúgving, ið byggir á støðið í 9. flokki í fólkaskúlanum. Útbúgvingin er almennandi, t.e. at útbúgvingin ikki gevur beinleiðis vinnumøguleikar eftir lokið prógv, men miðar fínóti, at tey ungu fara í framhaldandi útbúgving.

ad § 6: Skotið verður upp, at nýggja studentaskúlaskipanin hevur tvær deildir, eina málsliga og eina støddfrøðiliga. Í greinini verður tilskilað, hvørjar lærugreinir eru. Nýggja studentaskúlaskipanin er í ávísan mun ein valskipan, soleiðis at einstaki næmingurin kann velja tær lærugreinirnar á hástigi, sum hann hevur tørv fyri í framhaldandi útbúgving, men felagslærugreinirnar hava stóran leiklut. Greinin tilskilar eisini teir yvirornaðu karmarnar fyri skipanina.

ad § 7. Henda greinin ásetur øll viðurskifti viðvíkjandi prøvtøku. Í hesum sambandi skal prøvtøkukunngerð gerast, sum tilskilar, hvussu mannagongdin er viðvíkjandi øllum viðurskiftum. Kæra um avgerðir tiknar í sambandi við prøvtøku, herundir um ásetan av prøvtali, kann innan 2 dagar, aftaná at avgerðin er kunngjørd næminginum, leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum, ið landsstýrið ásetur. Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

ad § 8: Ætlanin við hesi ásetingini er at lata upp fyri samstarvi við aðrar gymnasialar útbúgvingar, eitt nú handilsskúlan, um ávísar lærugreinir.

ad § 9: Karmarnir fyri upptøku á studentaskúla eru tilskilaðir í hesi grein, meðan tær ítøkiligu reglurnar verða tilskilaðar í eini upptøkukunngerð.

ad § 10: Tilskilað verður, at landsstýrið er tann myndugleiki, ið setur í starv og loysir úr starvi rektara.

ad § 11: Sambært hesi grein er tað rektarin, sum hevur ábyrgdina av studentaskúlanum. Endamálið við hesu grein er m.a. greitt at tilskila, at tað bert er rektarin, ið hevur rætt og skyldu at útinna ávísar funktiónir á skúlanum. M.a. í sambandi við at farið verður yvir til mál- og rammustýring, verður tað mett umráðandi, at ábyrgdin verður greitt tilskilað.

ad § 14: Í hesi grein verða øll viðurskifti viðvíkjandi lærarum við studentaskúlar tilskilað, herundir førleikakrøv bæði fakliga og námsfrøðiliga.

ad § 16: Skotið verður upp, at undirvísingin verður kostnaðarleys fyri næmingarnar, samstundis sum lógarheimild verður fyri, at næmingarnir á studentaskúlanum sjálvir skulu útvega sær bøkur og annað undirvísingartilfar. Higartil hevur tað ikki verið

tilskilað nakrastaðni, men praksis hevur verið so. Skotið verður upp, at heimild verður fyri at taka gjald fyri ljóstøk, sum nýtt verða í undirvísingini.

ad § 17: Her verður skotið upp at veita styrk til næming, ið fer á skúla uttanfyri norðanlond at fáa sær t.d. 1.B.

ad § 18: Møguleiki skal vera fyri at gera frávik frá reglunum í hesi lóg, men frávik mugu á ongan háu minka um møguleikarnar hjá næmingunum at halda fram í hægri framhaldslestri.

ad § 19: Skotið verður upp, at avgerðir rektarans í námsfrøðiligum málum og málum, sum viðvíkja næmingum sambært § 11, stk. 4, innan 5 dagar eftir at avgerðin er kunngjørd næminginum, kunnu leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum, ið landsstýrið ásetir. Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

ad § 21: Sambært uppskotinum verður lógin at nýta fyrstu ferð fyri teir næmingar, sum byrjaðu í 1. studentaskúlaflokki aftaná 1. august 1994.

Av tí at studentaskúlarnir og HF-skeiðini bæði eru tikin við í hesum lógaruppskoti verður skotið upp at seta úr gildi lógina um Føroya Studentaskúla og HF-skeið við scinni broytingum og lógina um Studentaskúla og HF-skeiðið í Eysturoy við scinni broytingum. Skotið verður upp at seta úr gildi lógina um studentsprøvtøku, tó soleiðis at lógin framvegis er galdandi fyri teir næmingar, sum vóru tiknir inn á studentaskúlan áðrenn 1. august 1994. Henda skiftisregla verður at galda til endan av skúlaárinum 1995-96.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. apríl 1995.

Við 1. viðgerð tann 24. apríl 1995 varð málið beint í mentannar- og skúlanevndina.

Mentannar- og skúlanevndin hevur undir viðgerðini av málinum havt fund við Eilif Samuelsen, landstýrismann í skúlamálum, umboðum fyri landsskúlafyrisitingina og lærarar í fornaldarfrøðið við skúlarnar í Hoydølum og á Kambsdali.

Ein samd nevnd setur tí fram fylgjandi:

U p p s k o t

til

samtyktar

Nevndin mælir til, at núverandi royndarskipan heldur áfram eitt ár afturat.

Mælt verður tí landsstýrinum til, at leggja málið fram aftur í góðari tíð í komandi tingsetu soleiðis, at nevndin fær stundir til at geva málinum ta viðgerð sum er neyðug.

2. viðgerð 29. mai 1995. Málið varð afturbeint í mentannar- og skúlanevndina, sum 30. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t II

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. apríl 1995 og við 1. viðgerð 24. apríl 1995 beint í skúlanevndina.

Við 2. viðgerð 29. mai 1995 varð málið beint aftur í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum og tekur **ein samd nevnd** undir við málinum, men setir tó fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

<u>løgtingslóg um studentaskúlar v.m.</u>	<u>lagtingslov om gymnasier m.m.</u>
§ 1, stk. 2 og § 2 verða strikaðar.	§ 1, stk. 2 og § 2 udgår.
§§ 3-21 verða broyttar til §§ 2-20.	§§ 3-21 ændres til §§ 2-20.

Sum boðað frá í fyrra áliti frá mentannar- og skúlanevndini, varð fundur hildin við lærarar á studentaskúlanum í Hoydølum og á Kambsdali um lærugreinina fornaldarfrøði. Lærararnir gjørdu vart við, at lærugreinin fornaldarfrøði hevði ikki fingið tað pláss í studentaskúlaútbúgvingini, sum hon hevði havt, og um sammett verður við t.d. danskar studentaskúlar, so hava okkara skúlar færri tímar í nevndu lærugrein.

Løgtingsins mentannar- og skúlanevnd mælir landsstýrinum til at taka henda spurning upp til viðgerðar av nýggjum og um hildið verður, at ymiskt talar fyri at fremja broytingar, so eigur tað at verða lagt fyri tingið í komandi tingsetu.

Vísandi til tað, ið er komið fram, verður sett fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at kanna eftir hvussu støðan er hjá fornaldarfrøði, søgu o.ø. samanborið við studentaskúlar í øðrum Norðurlondum. Um neyðugt verða broytingar gjørdar hesum viðvíkjandi.

Framhaldandi 2. viðgerð 30. mai 1995. Uppskot landsstýrisins við broyting frá nevndini samtykt við 26-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar útsett.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar samtykt við 21-0 atkvøðum.

Lóg nr. 106 frá 10. juni 1995.

FL jnr. 2102-5/91.

98 Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Landsskúlaráðið hevur 5 limir, sum landsstýrið velur. Landsstýrið tilnevnir formannin. Samstundis verða vald persónlig varafólk, sum taka sæti í ráðnum, tá ráðslimi berst frá. Limirnir verða valdir fyri 4 ár í senn, tó so at ráðslimur verður sitandi, til nýggjur limur er valdur."
2) Í § 14 gongur út orðið "varabispinum" og í staðin verður sett: "bispinum".

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.
Stk. 2. Nýval av Landsskúlaráð eftir hesi løgtingslóg fer fram aftaná at lógin hevur fingið gildi og í seinasta lagi 1. oktober 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om undervisningsvæsen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 58 af 2. oktober 1978 om styrelsen af undervisningsvæsenet foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 1 affattes således:
"Undervisningsrådet består af 5 medlemmer, valgt af landsstyret. Landsstyret udpeger formanden. Samtidig vælges stedfortrædere, der indtræder i rådet ved et rådsmedlems forfald. Rådsmedlemmernes valgperiode er 4 år, dog således, at rådsmedlemmerne forbliver i bestyrelsen, til nye medlemmer er valgte."
2) I § 14 udgår ordet "vicebiskoppen" og i stedet indsættes: "biskoppen".

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.
Stk. 2. Ekstraordinært valg af undervisningsrådet efter denne lagtingslov foretages efter lovens ikrafttræden og senest 1. oktober 1995.

Viðmerkingar:

Vísandi til løgtingssamtyktina frá 22. juni 1994, har løgtingið í samband við nýggja stýrisskipanarlóg m.a. áleggur landsstýrinum at gera neyðugar lógarbroytingar, sum leggja allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið, verður við hesum lagt uppskot fyri løgtingið um at broyta lógina um skúlafyrisiting soleiðis, at tað verður landsstýrið, ið velur landsskúlaráðið.

Broyting nr. 2 er ein fylgja av, at Føroyar í 1990 gjørdust sjálvstøðugt biskupsdømi.

1. viðgerð 21. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndinu, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli nr. 94/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Broytingaruppskot til § 3 samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð 31. mai 1995. Málið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

Lóg nr. 95 frá 13. juni 1995.

99 Avtøka av løgtingslóg um ávísar skúlar

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um ávísar skúlar.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 62 frá 9. juni 1988 um ávísar skúlar, sum broytt við løgtingslóg nr. 7 frá 16. januar 1990 verður avtikin.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om bestemte skoler.

§ 1.

Lagtingslov nr. 62 af 9. juni 1988 om bestemte skoler, som ændret ved lagtingslov nr. 7 af 16. januar 1990 ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Lógin kann avtakast vísandi til, at verður talan um útbygging av skúlum, er neyðugt at útvega játtan á løgtingsfíggjarlógini. Síðani 1992 eru fløgur útgreinaðar á løgtings-

fíggjarlógini. Síðan 1994 er tað sama gjørt viðvíkjandi viðlíkahaldinum.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. apríl 1995.

Við 1. viðgerð tann 24. apríl 1995 varð málið beint í mentannar- og skúlanevndina.

Mentannar- og skúlanevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan A. Johannessen, Finnbogi Arge, Kristian Magnussen og Óli Breckmann) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

Minnilutin (Signar á Brúnni) tekur ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 29. mai 1995. Uppskotið fall við 13-0 atkvøðum.

100 Fyrispurningar

Sí fyrispurningar á síðu 810

101 Avtøka av meirvirðisgjaldinum á arbeiðslønum

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at fyrireika avtøku av MVG-gjaldinum á arbeiðslønum at koma í gildi frá 1. januar 1996.

Viðmerkingar:
1. januar 1993 kom í gildi meirvirðisgjaldið (MVG) - nýggja óbeinleiðis skattaskipanin. Meirvirðisgjaldið kom í staðin fyri innflutningsgjaldsskipanina, ið virkaði sum føroyskur verjutollur mótvegis innfluttum europeiskum vørum.

Í nýggja handilssáttmálanum við EF (nú ES), var kravið m.a., at europeiskar vørur á føroyska marknaðinum stóðu javnbjóðis føroyskt framleiddum vørum í frífari prískapping. MVG-skipanin hevur verið nýtt leingi í flestu londunum á okkara leiðum, og metti landsstýrið tá, at henda skipan var tann frægasta fyri føroyska framleiðslu heldur enn aðrar skipanir, sum t.d. framleiðslugjøld á føroyskar vørur.

Í gomlu avgjaldsskipanini var ein ørgrynna av ymiskum punktgjøldum, tollsatsum, innflutnings- og øðrum gjøldum. Sostatt varð farið frá einari fløktari skipan til einsháttaðu avgjaldsskipanina.

Hóast skipanin hevur virkað væl á nógvum økjum, og at vøruprísirnir mest sum vórðu óbroyttir, ja enntá bíligari á summum húsarhaldsvørum enn frammanundan, so hevur skipanin havt óhepnar avleiðingar fyri nakrar MVG- skyldugar vinnufyritøkur.

Serliga tykist MVG-rð at hava verið ein kleppur fyri handverks- og tænastuvinnuna og javnan hoyrist, at meirvirðisgjaldsskipanin fær skuldina fyri, at vinnuvirki eru farin á húsagang. Hóast tað er sera trupult at staðfesta við hagtølum, so sýnist MVG-gjaldið á arbeiðslønum at hava darvað handverksvinnuni munandi.

Hildið verður eisini uppá, at "svart arbeiði" av hesi orsøk hevur breitt seg millum handverkarar, tí hesir ikki hava annað val enn at arbeiða uttanfyri lógarásettu skattaskipanina, skulu teir fóta sær fíggjarliga í samfelagnum (alternativið er at rýma hiðani í onnur lond at arbeiða).

Sostatt kvalir henda gongdin MVG-skyldugar framleiðslu-, handverks- og tænastufyri-

tøkur, tí tær ikki hava annað val enn at lúka almennu treytirnar og kunnu illa klára kappingina móti óskrásetta arbeiðinum í landinum.

Eisini hevur MVG-skipanin við sær, at kommunurnar eru varnar, tá ræður um at keypa tænastur frá vinnuni. Við galdandi skipan fáa kommunurnar bert endurrindað 75% av meirvirðisgjaldinum umframt, at upp til 4 mør. ganga til sjálva endurgjaldingina. Sostatt tyngir skipanin likviditetin hjá kommunum.

Hetta ger, at fyri kommunurnar er tað ofta bíligari at seta fólk í starv, heldur enn at keypa tænasturnar, og er MVG-skipanin tí við til at økja um almenna virksemið upp á bekostning av vinnuni.

At politikarar og almennu myndulcikarnir eru varugir við trupulcikarnar í MVG-skipanini, eru nógv dømi um. Serliga eru lógirnar um frádráttirnar til umvælingar av sethúsum og persónbilum besta prógvið.

Treytirnar í lógunum, at arbeiðini verða gjørd av virkjum og handverkarum, ið eru MVG-skrásett, skal skattgjaldarin kunna draga upphæddina frá inntøkuni, lýsa viðurkenningina av, at arbeiði uttan fyri skrásettu avgjaldsskipanina er ein vaksandi trupulleiki, og at hildið verður, at ávís spekulatión er við skipanini.

Ein álvarsligur spurningur, sum er avleiddur av galdandi MVG-lóg, er tí spurningurin um rættarhugsanina millum manna.

Tað eru nógv dømi um, at lógin verður brotin, og at hon er trupul at halda uppi (hondhevja). Tískil er vandi fyri vaksandi óskili á økinum, og verður lógin tí innanholað, sum frálíður. Tað, at lógin kann brótast, uttan at lógarbrotini fáa fylgjur, er tí niðurbrótandi fyri rættarhugsan og rættartilvitan borgaranna.

Tað skerst tó ikki burtur, at tað loysir seg betur hjá bæði kunda og handverkara/-tænastuvinnu at gera síntámillum avtalu uttan fyri skrásettu skipanina. Báðir partar fáa meira fyri minni og við verandi skatta- og avgjaldstrýsti annars, sum er við at trýsta búskapin undir heilt, er helst ilt at kenna serligt samvitskubit av at gera framíhjáavtalur.

Sostatt kann skipanin, saman við oyðandi skattatrýstinum, vera við til at avlaga tilvitanina um ábyrgd og skyldur mótvegis samfelagnum.

Verður hetta gongdin, so er vandi fyri, at alt størri partur av peningarenslinum í samfelagnum, sum frálíður, fer uttan um skrásettu skipanina.

Við eini broyttari skipan, har MVG-ið verður avtikið á arbeiðslønum, fer landskassin í stutta skiftistíð at missa partar av síni inntøku. Hinvegin leggur henda broyting lunnar undir, at hópin av vinnuvirkjum kann verða lív lagað, tí óskipaða arbeiðið ikki longur loysir seg, og at hesin parturin í búsakpinum aftur gerst sjónligur.

Tí verður tað bert talan um ávíst tíðarbil, til land og kommunur fáa vaksandi

skattainntøkur.

Hesin afturvunni skattur, og spardi peningurin í arbeiðsloysisskipanini (ALS), fer at muna væl í mista MVG-gjaldinum umframt, at skipanin fer at skapa betri samljóð millum borgarar og hitt almenna.

Tað er onki í handilssáttmálum okkara við umheimin, sum forðar okkum at differentiera meirvirðisgjaldsskipanina. Tí eigur landsstýrið skjótast at fyrireika avtøku av MVG-inum á arbeiðslønum at koma í gildi frá 1. januar 1996.

Sum støði eigur at verða fingið til vega búskaparligt modell, sum lýsir sínámillum ávirkanina millum lønir, skatt, avgjøld, nýtslu o.a.

Verður sjøtul settur á til vars, hevur landsstýrið rúma tíð at laga fíggjarlógina eftir broyttu inntøkuumstøðunum og kann sostatt verða lagt upp fyri møguligum inntøkumissi, sum fer at vera í byrjanini tá nýggja skipanin fer at virka.

Fyri í høvuðsheitum at lýsa gongdina í búskapinum seinastu árini, eru hjáløgd nøkur hagtøl (tabellir og talvur) á næstu síðunum.

1. viðgerð 26. apríl 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 26. apríl 1995 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur skattanevndin hevur býtt seg í ein meirihta og ein minniluta.

Meirilutin (Sunc Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen og Finnbogi Ísakson) tekur ikki undir við uppskotinum. Meirilutin førir fram, at við at undantaks arbeiðsløninа frá meirvirðisgjaldi, verður gjørt eitt brot á grundleggjandi meginregluna á mvg-skipanini. Meirilutin metir eisini, at tað ikki eiga at verða gjørd fleiri undantøk í mvg-skipanini.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) tekur undir við uppskotinum.

2. viðgerð 1. juni 1995. Málið fall við 8-0 atkvøðum.

102 Tilráðing frá Tingmannaráð Útnorðurs

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Lisbeth L. Petersen, løgtingsmaður, vegna Tingmannaráð Útnorðurs fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at hjálagda tilráðing nr. 1/1994 verður fyrireikað av landsstýrinum at seta í verk.

Landsstýrið kunnar løgtingið um gongdina í málinum.

1. viðgerð 27. apríl 1995. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

103 Broyting í løgtingslóg um útvarp.

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útvarp.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 28. mais 1956 um útvarp, sum seinast broytt við løgtingslóg

lagtingslov om ændring i lagtingslov om radiospredning.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 28. marts 1956 om radiospredning, som senest ændret ved

nr. 182 frá 18. desember 1992 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verða orðini "Løgtingið" og "løgtingsins" broytt til: "Landið" og "landsins".
2) Í § 3, stk. 2 ganga út orðini "eftir tilráðing fíggjarnevndarinnar".

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

lagtingslov nr. 182 af 18. december 1992 foretages følgende ændringer:

1) I § 1 ændres ordene "Lagtinget" og "lagtingets" til: "Hjemmestyret" og "hjemmestyrets".
2) I § 3, stk. 2 udgår ordene "efter finansudvalgets indstilling".

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Vísandi til løgtingssamtyktina frá 22. juni 1994, har løgtingið í samband við nýggja stýrisskipanarlóg m.a. áleggur landsstýrinum at gera neyðugar lógarbroytingar, sum taka av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið, verður við hesum lagt fram uppskot fyri løgtingið um at broyta lógina um útvarp soleiðis, at landið fær einarætt at hava útvarp í Føroyum og at landsstýrið áseetur útvarpsgjaldið uttan tilráðing frá fíggjarnevndini.

1. viðgerð 21. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Felagsálit

í

løgtingsmáli nr. 103/1994: Broyting í løgtingslóg um útvarp.
nr. 123/94: Broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya.
nr. 125/94: Broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning.
nr. 126/94: Broyting í løgtingslóg um áseting av telefongjøldum.
nr. 134/94: Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við stýrisskipannarlógin fær gildi. (Fiskiveiðu- og sjóvinnumál).
nr. 135/94: Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Handilsmál).
nr. 136/94: Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Ídnaðar- og menningarmál).
nr. 143/94: Broytingar í tryggingarlóggávuni.
nr. 144/94: Broyting í ávísum løgtingslógum innan kommunala økið í samband við, at stýrisskipannarlógin fær gildi.
nr. 145/94: Broyting í lóg fyri Føroyar um stýrið kirkjunnar.
nr. 148/94: Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna.
nr. 149/94: Broyting í løgtingslóg um tænastumenn landsins.
og nr. 150/94: Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir.

Løgtingsmálini nr. 103, 123, 125, 126, 134, 135, 136, 143, 144, 145, 148, 149 og 150/94 eru framløgd tann 18. apríl 1995 og eru aftan á 1. viðgerð tann 21. apríl 1995 beind í rættarnevndina.

Løgtingsmálini nr. 134, 135, 143, 144, 145, 148, 149 og 150 eru framløgd av landsstýrinum tann 20. apríl 1995, og eru aftan á 1. viðgerð tann 24. apríl 1995 beind í rættarnevndina.

Løgtingsmálið nr. 136/94 er lagt fram av landsstýrinum tann 26. apríl 1995 og er aftan á 1. viðgerð 2. mai 1995 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt uppskotini og staðfestir, at uppskotini eru í samsvar við ásetingarnar við nýggju stýrisskipannarlógina um at skilja sundur tað útinnandi valdið og tað lóggevandi valdið.

Ein samd rættarnevnd mælir tí løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram soljóðandi

Í s k o y t i s á l i t

í

løgtingsmáli nr. 103/1994: Broyting í løgtingslóg um útvarp.
nr. 123/94: Broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya.
nr. 125/94: Broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning.
nr. 126/94: Broyting í løgtingslóg um áseting av telefongjøldum.
nr. 134/94: Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við stýrisskipannarlógin fær gildi. (Fiskiveiðu- og sjóvinnumál).
ur. 135/94: Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Handilsmál).
ur. 136/94: Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipannarlógin fær gildi. (Ídnaðar- og menningarmál).
nr. 143/94: Broytingar í tryggingarlóggávuni.
nr. 144/94: Broyting í ávísum løgtingslógum innan kommunala økið í samband við, at stýrisskipannarlógin fær gildi.
nr. 145/94: Broyting í lóg fyri Føroyar um stýrið kirkjunnar.
nr. 148/94: Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna.
nr. 149/94: Broyting í løgtingslóg um tænastumenn landsins.
og ur. 150/94: Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirløn.

Í felagsálitinum til hesi løgtingsmál ásannar rættarnevndin, at broytingar, sum landsstýrið skjýtur upp, eru í samsvar við nýggju stýrisskipannarlógina. Tó metir rættarnevndin, nú greiður skilnaður skal fáast millum lóggávuvald og útinnandi vald,

at tað er neyðugt at heita á landsstýrið at dagføra lóggávuna soleiðis, at summar av teimum heimildunum verða beindar til lóggávuvaldið (løgtingið), heimildir, sum landsstýri og fiskivinnu-, fíggjar- og marknaðarnevnd hava umsitið í felag, og sum við hesum broytingum nú einans verða umsitnar av útinnandi valdinum (landsstýrinum).

Samsvarandi omanfyristandandi verður sett fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at dagføra lóggávuna í hesum løgtingsmálum við tí endamáli at ávísar heimildir, sum við hesum broytingum nú einans eru í landsstýrinum, verða løgtingsheimildir.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 88 frá 13. juni 1995.

104 Broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 11 frá 14. februar 1957

lagtingslov om ændring i lagtingslov om radioudvalg.

§ 1.

I lagtingslov nr. 11 af 14. februar 1957

um útvarpsnevnd við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:
§ 1 verður orðað soleiðis:
"§ 1. Sett verður útvarpsnevnd við 5 limum. Landsstýrið velur hesar fyri 4 ár í senn. Landsstýrið uppnevnir formannin limanna millum. Landsstýrið kann tó eftir tilráðing frá lurtarafeløgum, sum frammanundan hava fingið góðkenda tilráðingarheimild frá landsstýrinum, nøra um nevndina við 1 limi.
Stk. 2. Samstundis verða eisini valdir 5 tiltakslimir og eftir tilráðing frá lurtarafeløgum við tilráðingarheimild velur landsstýrið tiltakslim fyri møguligan eykalim."

om radioudvalg med senere ændringer affattes § 1 således:
"§ 1. Der nedsættes et radioudvalg på 5 medlemmer. Disse udpeges af landsstyret for en 4 årig periode. Landsstyret vælger formanden blandt medlemmerne. Dog kan landsstyret efter indstilling fra lytterforeninger, der af landsstyret i forvejen har fået godkendt indstillingsret, øge udvalgsmedlemmernes antal med 1 medlem.
Stk. 2. Samtidig bliver også valgt 5 suppleanter og efter indstilling fra lytterforeningerne med indstillingsret vælger landsstyret suppleant til muligt ekstramedlem."

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.
Stk. 2. Nýval av útvarpsnevnd eftir hesi løgtingslóg fer fram aftaná at lógin hevur fingið gildi og í seinasta lagi 1. oktober 1995.

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.
Stk. 2. Ekstraordinært valg af radionævn efter denne lagtingslov foretages efter lovens ikrafttræden og senest 1. oktober 1995.

Viðmerkingar:

Vísandi til løgtingssamtyktina frá 22. juni 1994, har løgtingið í samband við nýggja stýrisskipanarlóg m.a. áleggur landsstýrinum at gera neyðugar lógarbroytingar, sum leggja allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið, verður við hesum lagt uppskot fyri løgtingið um at broyta lógina um útvarpsnevnd soleiðis, at tað verður landsstýrið, ið velur útvarpsnevndina.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 94/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Broytingaruppskot til § 4 samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð 31. mai 1995. Mál endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

Lóg nr. 87 frá 13. juni 1995.

105 Broyting í løgtingslóg um sjónvarp

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjónvarp.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp, sum broytt við løgtingslóg nr. 183 frá 18. desember 1992, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður orðið "løgtingið" broytt til: "landið".
2) Í § 4, stk. 2 ganga út orðini "eftir tilráðing fíggjarnevndarinnar".

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fjernsyn.

§ 1.

I lagtingslov nr. 77 af 21. maj 1982 om fjernsyn, som ændret ved lagtingslov nr. 183 af 18. december 1992, foretages følgende ændringer:

1) I § 1 ændres ordet "lagtinget" til: "hjemmestyret".
2) I § 4, stk. 2 udgår ordene "efter finansudvalgets indstilling".

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Vísandi til løgtingssamtyktina frá 22. juni 1994, har løgtingið í samband við nýggja stýrisskipanarlóg m.a. áleggur landsstýrinum at gera neyðugar lógarbroytingar, sum taka av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggja tær til landsstýrið, verður við hesum lagt fram uppskot fyri løgtingið um at broyta lógina um sjónvarp soleiðis, at landið fær einkarrætt til at senda sjónvarp í Føroyum og at landsstýrið ásetur sjónvarpsgjaldið uttan tilráðing frá fíggjarnevnd løgtingsins.

1. viðgerð 21. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 94/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Broytingaruppskot til § 5 samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins soleiðis broytt samtykt við 19-0 atkvøðum.

3. viðgerð 31. mai 1995. Málið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 85 frá 13. juni 1995.

106 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

§ 96, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"**Stk. 2.** Í landsskattanevndini eru 5 landsstýrisvaldir limir. Nevndin skipar seg sjálv við formanni og varaformanni og hevur fastan skrivara, sum skal vera lógar- og roknskaparkønir. Á sama hátt velur landsstýrið 5 varalimir. Starvstíð nevndarinnar og varalimanna er 4 ár."

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

Stk. 2. Nýval av nevndum eftir hesi løgtingslóg fer fram aftaná, at lógin hevur fingið gildi og í seinasta lagi 1. oktober 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

§ 96, stk. 2 affattes således:

"**Stk. 2.** Landsskatteudvalget består af 5 medlemmer, valgt af landsstyret. Udvalget vælger selv formand og næstformand og har fast sekretær, som skal være lov- og regnskabskyndig. Ligeledes vælger landsstyret 5 stedfortrædere. Funktionstiden for medlemmerne og stedfortræderne er 4 år."

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Stk. 2. Ekstraordinært valg af nævn efter denne lagtingslov foretages efter lovens ikrafttræden og senest 1. oktober 1995.

Viðmerkingar:

Løgtingið álegði landsstýrinum við løgtingssamtykt 22. juni 1994 at leggja uppskot fyri løgtingið innan 1. januar 1995:

1. Uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið.
2. Uppskot til løgtingslóg og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnar til ríkislóg, sum leggur allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið.
3. Uppskot til løgtingslóg og uppskot til ríkismyndugleikarnar til ríkislóg, sum tekur av fyrisitingarligan myndugleika hjá nevndum, stýrum og ráðum og leggur hann til landsstýrið í teim førum, tá ið nevndin, stýrið ella ráðið ikki umboðar serligan

yrkiskunnleika ella serlig áhugamál, men bert vanlig politisk áhugamál.

4. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna soleiðis, at hon verður lagað til samtykta stýrisskipanarlógaruppskotið.

Samsvarandi hesi samtykt verður eftir hesum uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt fyrisitingarliga heimildin hjá løgtinginum at velja nevndarlimir í landsskattanevndina løgd til landsstýrið. Viðmerkjast skal, at ongar broytingar eru gjørdar viðvíkjandi tali av limum og varalimum og starvstíð nevndarinnar og varalimanna. Somuleiðis verða umsitingarligu uppgávur nevndarinnar og mannagongdir annars ikki broyttar.

Henda lógarbroyting hevur ongar meirútreiðslur við sær.

1. viðgerð 20. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Føroya landsstýri tann 18. apríl 1995 og aftan á 1. viðgerð tann 20. apríl 1995 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið hjá landsstýrinum.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 19-0 atkvøðum.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

Lóg nr. 61 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 2540-5/91.

107 Løgtingslóg um endurstovnan av íbúðagrunninum

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um endurstovnan av íbúðagrunninum.

§ 1. Íbúðagrunnur í løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 1987, sum varð avtikin sambært § 1, nr. 74 í løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum, verður endurstovnaður.

§ 2. Útlánini hjá grunninum, ið sambært § 1 í løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 gjørdust ogn landskassans, verða flutt aftur í grunnin.

§ 3. Henda lóg fær gildi 1. juni 1995.

lagtingslov om genetablering af boligfonden.

§ 1. Boligfonden i lagtingslov nr. 52 af 7. maj 1987, som blev ophævet ved § 1, nr. 74 i lagtingslov nr. 33 af 27. marts 1992 om ophævelse av landskassefonde, bliver genetableret.

§ 2. Fondens udlån, som efter § 1 i lagtingslov nr. 33 frá 27. marts 1992 blev en del af landskassens aktiver, overføres igen til fonden.

§ 3. Denne lov træder i kraft 1. juni 1995.

Viðmerkingar:

Íbúðagrunnurin varð avtikin sambært løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992, men løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 1987 um íbúðagrunn varð í hesum samhandi kortini ikki avtikin. Ivi hevur síðan verið um, hvørji málføri stjórn og stýri hava og hvussu verða skal við grunninum framefter. Sum støðan er við atliti at fíggjarstøðuni hjá Íbúðagrunninum, kann roknskapurin fyri 1992, 1993 og 1994 ikki gerast, fyrr enn greiða er fingin á, hvat gerast skal við grunnin.

Tá grunnurin varð avtikin í 1992, var eginognin 25,5 mió. kr. sambært roknskapinum fyri 1991. Grunnurin átti tilgóðar hjá landskassanum 15,6 mió. kr., umframt innistandandi 1,36 mió. kr. Veðlánini vóru 7,3 mió. kr. og innskot uppá umleið 0,5 mió. kr. Eftir avtøkuna av Íbúðagrunninum í 1992 vóru saldoirnar fluttar til kapitalkonto landskassans. Ognirnar hjá grunninum, íroknað útlán hjá grunninum gjørdust ogn landskassans. Landskassin yvirtók tær skyldur, ið álagdar vóru grunninum. Viðmerkjast kann, at veðlánini eru tryggjað við veð í føstu ognunum innanfyri 90% av virðinum.

Soleiðis sum útboð- og eftirspurningur er á sethúsa- og íbúðamarknaðinum í løtuni, er trupult at síggja nakað endamál og praktiskan týdning við grunninum. Um so er, at

henda gongdin broytist um nøkur ár, metir landsstýrið tað vera neyðugt, at tað almenna hevur ein íbúðapolitik, sum kann verða við til at stuðla einstaklingum og familjum við lægri inntøkum og/ella sosialum trupulleikin v.m. at festa búgv, t.d. raðhús og smærri íbúðir, til ein pris, sum er væl lægri enn keyp ella leiga av einum sethúsum. Viðmerkjast skal, at landsstýrið ikki konkret hevur kannað útboð- og eftirspurning á íbúða- og sethúsamarknaðinum, men hevur viðgjørt hetta meira alment við atliti at tí, sum bankar og Húsalánsgrunnurin boða frá um nýgerð av sethúsum, húsasølu v.m. Fyri at landsstýrið kann tilevna ein íbúðapolitikk og reglur um treytir fyri lánsveiting v.m. verður neyðugt, at hetta verður gjørt í tráð við tann tørv, sum er.

Fyrimunurin við at endurstovna grunnin er m.a., at eftir hondini sum útlánini verða inngoldin aftur í grunnin um nøkur ár, kann grunnurin byrja at virka eftir endamálinum uttan beinleiðis játtan á fíggjarlógini. Henda gongdin er treytað av, hvussu trygdin er aftanfyri verandi lán úr grunninum. Ein annar fyrimunur við at skipa grunnin aftur er, at tann peningur, sum játtaður verður, kann verða verandi í grunninum, til tørvur er á at veita lán.

Annars skal viðmerkjast, at verður grunnurin endurstovnaður, sum her skotið upp, verður ikki neyðugt hjá landsstýrinum at seta stovnsfæ í grunnin. Eginognin hjá grunninum verður tey veðhald og innskot, sum hesin longu hevur veitt. Í roknskapunum fyri 1992 fyri endurstovnaða grunnin verður tilgóðahavandi grunsins uppá 15,6 mió. kr. hjá landskassanum og innistandandi uppá 1,36 mió. kr. avskrivað og eginognin tílsvarandi niðurskrivað. Útlánsvirksomið hjá grunninum verður, aftaná at hesin er endurstovnaður, treytað fyri ein part av játtanum á fíggjarlógini, t.v.s. hvat landsstýrið og løgtingið ynskja av almennari stýring og ávirkan á íbúðapolitikkin og fyri ein part um verandi útlán koma innaftur í grunnin.

Landsstýrið fer við hesum at leggja uppskot fyri løgtingið um løgtingslóg um endurstovnan av íbúðagrunninum.

1. viðgerð 20. apríl 1995. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. apríl 1995.

Við 1. viðgerð tann 20. apríl 1995 varð málið beint í almanna- og heilsunevndina.

Almanna- og heilsunevndin hevur viðgjørt málið. Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 26. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Við atkvøðugreiðslu 29. mai 1995 varð uppskotið samtykt við 30-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

Lóg nr. 65 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 2305-1/90.

108 Lækkan av søluprísinum á drekkimjólk

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Jenis av Rana, løgtingsmaður, vegna miðflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya løgting heitir á landsstýrið um at seta tiltøk í verk fyri at lækka søluprísin á drekkimjólk, t.d. við at veita ein niðurgreiðslustuðul svarandi til kr. 2 - 3 fyri liturin.

Viðmerkingar:

Tann 1. januar 1993 varð kvota sett á føroysku mjólkaframleiðsluna. Hendan avgerðin varð grundað á eina meting um, at eitt ovasta mark varð nátt fyri teirri nøgd av føroyskari drekkimjólk, ið seljast kundi.

Hendan avgerðin hevur ført til stíg í teirri menning, sum fór fram á hesum týðandi vinnuøki okkara, bøndur hava verið noyddir at repa seglini, siga fólki úr starvi og leita aðrar leiðir.

Centralt í spurninginum um mjólkaframleiðsluna er prísurin. Í løtuni kostar 1 litur av mjólk góðar kr. 9,- frá handilsmanninum. Í sjálvum sær er hetta ein ørandi prísur fyri hendan heilsufrembjandi drykkin, væl meira enn í Danmørk, og heilt burturvið verður tað, um vit meta saman við handilsprísin á øðrum tilboðum, sum børnum okkara

stendur í boði. Sodavatn fæst fyri heilt niður í 5 kr. fyri liturin, meðan litaða sukurvatnið (saftin), kann keypast fyri minni enn kr. 2,- fyri liturin. Ei undur í, at nógvar føroyskar barnafamiljur í hesum kreppudøgnum freistast at keypa tað bíliga, og harvið spara krónurnar, sum hjá flestum munnu vanta frammanundan.

Taparin í øllum er barnið, sum sambært øllum serkunnleika so sáran tørvar heilsugevandi mjólkina.

Annað í hesum sambandi er, at vit innflyta ikki so smáar nøgdir av útlendskari mjólk (sambært hagdeildini knappliga 500.000 litrar í 1994). So átti als ikki at verið og kannað átti at verið, um ikki heimild finst fyri at steðga hesum ørskapinum.

Ein rímuligari, lægri mjólkarprísur hevði sum fremsta mál verið ein útrætt hond til komandi ættarlið, lætt um hjá dagsins barnafamiljum, skapað fleiri arbeiðspláss í vinnuni, minkað um innflutningin av bæði útlendskari mjólk og sodavatni, og skundað undir uppdyrkanina av tí náttúrurfkidømi, sum landbúnaðurin røkir.

Óivað eru fleiri vegir at náa hetta málið - lægri prís á drekkimjólk. Mest vittgangandi og vandamiklasta loysnin hevði verið at tikið kvoturnar av og so sæð, hvat hendi. Annar møguleiki var at hækka barnafrádráttin ella veita serstakan mjólkarfrádrátt, men slíkar loysnir høvdu ikki tryggjað, at peningurin verður brúktur til tað, hann varð ætlaður.

Loysnin, sum í hesum uppskotinum verður miðmælt, er at veita sokallaðan niðurgreiðslustuðul til mjólkarframleiðaran, stuðul, sum verður øyramerktur til lækkan av drekkimjólkarprísinum, t.e. vanlig mjólk, hálvskúmað og skúmað, meðan tann parturin av mjólkini, sum fer til aðrar framleiðslur, verður undantikin. Sambært upplýsingum frá Mjólkarvirki Búnaðarmanna snýr tað seg um 4.760.000 litrar av drekkimjólk um árið.

1. viðgerð 3. mai 1995. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Nevndin er samd við uppskotsstillaran í, at tað eigur at verða gjørt nakað ítøkiligt við málið, um so er, at foreldur ikki hava ráð at keypa mjólk, men velja at keypa saft og sodavatn ístaðin.

Nevndin metir, at sum støðan er í samfelagnum, so er orsøk at óttast at fíggjarliga

orkan hjá fólki í dag er so lítil, at vandi er fyri, at trupulleikin ikki bert snýr seg um mjólk, men heldur er so umfatandi, at børn og vaksin eru í vanda fyri ikki at fáa so fjølbroyttan og heilsugevandi kost, ið krevst fyri best møguligum trivnaði, og at hetta tí kann gerast eitt vandamál fyri fólkaheilsuna í Føroyum.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Kristian Magnussen, Sverre Midjord, Maria Hansen og Jørgen Niclasen) tekur ikki undir við uppskotinum men heitir á landsstýrið og Føroya løgting um førdur verður ein politikkur, ið tryggjar barnafamiljur fíggjarliga soleiðis, at møguleiki er hjá hesum at skaffa sær fjølbroyttan og heilsugóðan kost.

Minnilutin (Lasse Klein) er samdur við uppskotsstillaranum í at Føroya Løgting heitir á Føroya landsstýri um at lækka søluprísin á drekkimjólk.

Annars tekur minnilutin støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 31. mai 1995. Málið fall við 4-0 atkvøðum.

109 Broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m.

Ár 1995, týsdagin 18. aprfl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um vektgjald av motorakførum v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broyting-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om vægtudgift af motorkøretøjer m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 38 af 31. marts 1982 om vægtudgift af motorkøretøjer m.v. med senere ændringer foretages følgende ænd-

ar:

1) Í § 3 verður sum stk. 2 sett:
"**Stk. 2.** Í sambandi við at kravið verður útskrivað og sent, kann gjaldstovan krevja eina upphædd svarandi til tað, sum postgjaldið er fyri at senda kravið út."
2) Í § 8, stk. 2 ganga út orðini "tó í mesta lagi 25 kr.".
3) § 9 verður orðað soleiðis:
"**§ 9.** Gjøld eftir hesi lóg kunnu innheintast við panting."
4) Sum nýggj § 13 a verður sett:
"**§ 13 a.** Ellisakfør rinda ½ gjald sambært § 3, stk. 1.
Stk. 2. Føroya Landsstýri fær heimild til at gera nærri reglur fyri ellisakfør."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

ringer:

1) I § 3 indsættes som stk. 2:
"**Stk. 2.** I forbindelse med at kravet udskrives og sendes, kan gjaldstovan kræve et beløb, der svarer til posttaksten for forsendelsen af kravet."
2) I § 8, stk. 2 udgår ordene "dog mindst 25 kr.".
3) § 9 affattes således:
"**§ 9.** Afgifter efter denne lov kan inddrives ved udpantning."
4) Som ny § 13 a indsættes:
"**§ 13 a.** Veterankøretøjer betaler ½ afgift i henhold til § 3, stk. 1.
Stk. 2. Føroya Landsstýri bemyndiges til at udfærdige nærmere regler for veterankøretøjer."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Sum er, krevur Føroya Gjaldstova inn porto í sambandi við, at krøvini verða send teimum, sum skulu gjalda vektgjald. Skipanin var við í sparipakkanum, sum Gjaldstovan legði fyri landsstýrið í 1989, men er ongantíð lógarfest.

Talan er um umleið 100.000 kr.

Landsstýrið skjýtur eisini upp at strika orðini í § 9 í lógini um vegskatt "tó í minsta lagi 25 kr.". Í staðin fyri hetta gjald er nú komið rykkjaragjald, sum er lógarfest aðrastaðni.

Áhugafelagið Føroya Ellisakfør hevur fleiri ferðir vent sær til landsstýrið um at skipa so fyri, at ellisakfør gjalda minni vektgjald enn akfør, sum dagliga ferðast á vegnum.

Hetta heldur landsstýrið verða rímiligt.

Í Danmark er líknandi lóg samtykt, og í hinum norðanlondum verður arbeitt við tí sama.

Tryggingarsambandið Føroyar hevur eina seravtalu við Føroya Ellisakfør viðvíkjandi trygging av ellisakførum, ið eru 25 ár og eldri.

Landsstýrið skjýtur upp, at vektgjaldið fyri ellisakfør verður 50% av tí, akfør vanliga gjalda, og at landsstýrinum verður heimilað at seta nærri reglur fyri ellisakfør

viðvíkjandi aldri, útsjónd o.s.fr.

1. viðgerð 21. apríl 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 21. apríl 1995 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 24-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 63 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 2520-41/95.

110 Skattafrádráttur fyri fiskimenn

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Føroya løgting samtykkir, at álagt verður landsstýrinum at kanna og skipa so fyri, at føroyskir sjómenn, sum sigla við útlendskum skipum, ikki verða verri fyri enn samstarvsfelagar teirra, og álagt verður landsstýrinum at kanna møguleikan fyri,

at serstakur sjómansfrádráttur kann koma í gildi í Føroyum - eins og í Danmark, Noregi og Íslandi.

Viðmerkingar:

Skattatrýstið í Føroyum er í dag so stórt, at tað kenst lokkandi fyri allar føroyskar sjómenn, sum fiska við útlendskum fiskiskipum, eina ferð med alla at flyta av landinum við øllum húski sínum, ella at krevja hjúnaskilnað og harvið fáa somu sømdir á skattaøkinum eins og samstarvsfelagar teirra.

Øll lond, vit ynskja at samanbera okkum við, hava nógv lægri skattatrýst enn vit, og tí kann fólkaflytingin gerast ein stór hóttan, um ikki broytingar á hesum øki henda rættiliga skjótt.

Tað er neyðugt, at gongd fæst á aftur hjá okkum, og tað tænir ongum endamáli at leggja uppaftur fleiri byrðar á virkandi fólk okkara á sjógvi og landi.

Tað skapti miklan framburð í Føroyum, tá ið havfiskiskapurin tók seg fram, og tað legði lunnar undir arbeiði á landi til nógvar hendur, so fólkatalið øktist í stórum.

Nú er øðrvísi vorðið. Stórt arbeiðsloysi ræður, sum eingi útlit eru fyri, fer at minka í bræði. Nógv fólk er flutt av landinum, og bygdasamfeløgini eru nú av álvara farin at merkja burturflytingina.

Vit mega steðga hesi gongd, og ein háttur at gera tað uppá, er, at teir verða stuðlaðir, sum veiða fiskin og flyta hann til lands. Í øðrum londum verður hetta gjørt við, at fiskimenn og útróðrarmenn fáa serligan skattafrádrátt.

Fiskivinnan er høvuðsvinnan, og haðani stavar allur útflutningur okkara, og tað verður ein sonn ólukka, um eisini fiskimenn í stórum tali verða noyddir at flyta burtur í onnur lond, har teir kunnu lívbjarga sær og sínum betur.

Fleiri felagsskapir og einstaklingar hava gjørt vart við hesi viðurskiftir, her kunnu nevnast Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Reiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag. Í 1994 hevði skattanevndin fundir við føroyskar sjómenn, sum sigldu við donskum og norskum skipum, umframt at skriv eru komin til tingið viðv. skatting av føroyskum sjómonnum, sum sigla við kanadiskum skipum, eisini viðurskiftini í Íslandi eru lýst í skrivligum tilfari.

DANMARK

Talið á føroyskum sjómonnum, sum longu eru fluttir til Danmarkar, er ikki kunnugt, men helst er talan um fleiri hundrað sjómenn, sum eru fluttir orsakað av skattatrýstinum, teir flestu fluttu á heysti 1993 og á vári 1994, men enn eru umleið 50 føroyingar, ið enn ikki eru fluttir.

Samlaði frádrátturin hjá einum sjómanni í Danmark er upp á kr. 79.000,oo, harav kr.

41.800,oo er ein serstakur fiskimannafrádráttur.

Hesar upplýsingar stava frá frágreiðingum til skattanevndina frá mars 1994, har fleiri dømi eru nevnd um stórar fíggjarligar fyrimunir hjá føroyskum sjómonnum at búseta seg í Danmark.

NOREG
Fleiri føroyskir sjómenn eru longu fluttir till Noregs, talan er møguliga um einar 150 føroyingar, og talið á teimum, sum enn eru húsettir í Føroyum, er mett til einar 50 føroyingar, og nakrir av teimum hava ætlanir um at flyta, um ikki broyting kemur í skattatrýstið í Føroyum, ella serstakur frádráttur fæst fyri teirra virksemi.

Norskir sjómenn verða roknaðir fyri sjómenn burturav, um so er, at teir eru mynstraðir minst 20 vikur árliga, og gevur hetta teimum rætt til ein serligan sjómansfrádrátt, sum er kr. 70.000,00, um so er, at inntøkan av sjónum er minst kr. 220.000,00, er hon minni, lækkar frádrátturin. Tá fáa teir ein serligan sjómansfrádrátt upp á kr. 70.000,00. Hetta er eisini gardandi fyri eitt nú stakar føroyingar, sum taka sær fastan bústað í Noregi.

Sambært teimum útrokningum, sum áður eru sendar skattanevndini, er skatturin av einari norskari hýru upp á kr. 250.000,00 21%.

ÍSLAND
Tað er ikki greitt, hvussu nógvir sjómenn hava valt fastan bústað í Íslandi. Er talan um sjómenn yvir eitt áramál, so er talan um eitt stórt tal av sjómonnum. Men mett verður ikki, at talið á føroyskum sjómonnum við føstum bústaði í Føroyum er serliga stórt.

Íslendingar hava serstakan sjómannafrádrátt, eins og í Danmark og Noreg, og samlaða skattatrýstið í Íslandi er nógv lægri enn í Føroyum. Skattur av inntøku á sjónum í Ísland er upp á millum 24 og 32%, og er lutfalsliga lægri enn fyri inntøkur uppi á landi.

KANADA
Fleiri føroyingar eru longu fluttir til Kanada, men eru uml. 30 føroyingar, sum sigla við kanadiskum fiskiskipum, sum enn eru búsettir í Føroyum.

Viðurskiftini hjá teimum, sum fiska í Kanada og t.d. í Danmark og Noregi, eru sera ólík, og verður í hesum sambandi víst til frágreiðingina frá Høgna W., Høgnesen, Toftir, og sum er send øllum flokkum á Føroya løgtingi.

TRUPULLEIKIN STÓRUR
Føroyskir sjómenn, sum fiska við útlendskum skipum, halda orsakað av skattatrýstinum í Føroyum, at teirra viðurskiftir verða so órímilig, at fleiri av teimum umhugsa loysnir, sum teir kortini treyðugt vilja. Men verða ikki ávísar broytingar framdar, so má roknast við hópflytingum av landinum av føroyskum sjómonnum.

Tað er ikki neyðugt at skilja hetta sum nakra hóttan, tí fleiri hava longu valt hesa loysn.

Viðurskiftini hjá føroyskum sjómonnum, sum fiska við útlendskum skipum, eru órímilig í mun til samstarvsfelagar teirra, og ósmidlig fyri hugin til at flyta seg hagar á arbeiðsmarknaðinum, sum inntøka fæst, og kunna fáa óhepnar sosialar og samfelagsbúskaparligar avleiðingar, verða viðurskiftini ikki tikin upp til viðgerðar.

Eitt er støðan hjá sjómonnum við útlendskum skipum, men spurningurin viðv. okkara egnu sjómonnum má sum ein náttúrlig avleiðing av støðuni eisini verða tikin upp til viðgerðar, og er hetta orsøkin til hetta uppskotið.

1. viðgerð 26. apríl 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 26. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 18. apríl og eftir 1. viðgerð 26. apríl 1995 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meiritutin (Sune Jacobsen, Karl Robert Johansen, Vilhelm Johannesen) er vitandi um, at landsstýrið arbeiðir við skattaspurninginum sum heild, og tí tekur meiritutin ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Finnbogi Ísakson) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 1. juni 1995. Málið fall við 12-0 atkvøðum.

111 Íløgustuðul til at roykja fisk og samráðingar við ES um at hækka loftið fyri fisk úr Føroyum og kanna møguleikarnar fyri eini tollunión: Møguleikar fyri 2.250 nýggjum arbeiðsplássum í útflutningsvinnuni.

Uppskot

til

samtyktar

I Landsstýrinum verður álagt at gera uppskot um íløgustuðul til at roykja laks, hýsu og svartkalva og leggja uppskotið fyri løgtingið á ólavsøku 1995.

II Landsstýrinum verður álagt at taka upp samráðingar við ES um at hækka loftið fyri fisk úr Føroyum beinanvegin og kanna møguleikarnar fyri eini tollunión.

Viðmerkingar:

Fyri at økja um fiskaviðgerð á landi er neyðugt at skipa so fyri, at nýggir alternativir møguleikar verða royndir, og ásannandi týdningin av jøvnum virksemi í fiskiídnaðinum kring alt landið er neyðugt at miða ímóti at skipa fortreytir fyri, at flakavirkisskipanin í størri mun kemur á privatar hendur soleiðis, at íløgulugur og fyritaksemi kunnu vekjast, og ónýttar framleiðslueindir aftur koma í vinnu, og tí er neyðugt, at meiri fæst burtur úr rávøruni, sum kemur upp á land.

Men tíverri tykist tað soleiðis, at eitt slag av virkisloysi tykist at ráða í landi okkara og tjóð, og fígging er ring at fáa hendur á.

Fá eru tey, ið sjálv hava pening til at fara undir nakað, hug og dirvi, sum støðan er. Arbeiðsloysið minkar tí ikki. Tað er tí átrokandi, at gongd fæst á. Neyðugt er, at vinnuhjólini aftur fara at mala, og fleiri fólk koma í arbeiði rættiliga skjótt.

Ein av møguleikunum er at stuðla góðsking av tí nógva alifiskinum, sum í dag verður útfluttur óvirkaður, bert kruvdur og reinsaður. Laksurin kann verða royktur, skorin sundur og vakuumpakkaður her tað sama sum í Danmark ella øðrum landi. Tá fáa vit dupult so nógvan prís fyri hann. Tað sama kann eisini verða gjørt við hýsu og svartkalva.

Sambært handilsavtalunum kann fløgustuðul verða veittur. Tað minkar um kapitalkostnaðin hjá virkjunum, sum higartil hava verið alt ov dýr. Tá verður rentukostnaðurin

eisini minni. Hann hevur beint fyri nógvum virkjum og noyðist niður.

Eina hóming av, hvussu stórt tal av fólki aftur kann koma í arbeiði, um farið verður undir at roykja laks, hýsu og svartkalva, fáa vit við at hyggja eftir tølunum fyri aldum laksi tey seinastu árini.

Útflutningur Føroya: (Samb. Hagtíðindum)

	Laksur/síl	Virði
1991	16.134 t	547,9 mió. kr.
1992	16.348 t	581,7 mió. kr.
1993	15.957 t	473,8 mió. kr.
1994	11.700 t	343,3 mió. kr.

Tað ber til at hækka útflutningstalið í krónum til tað dupulta við at roykja fiskin og gera hann borðbæran, og sjálvari alingini ber eisini til at fáa meira burturúr við at fara longur út.

100 tons av royktum fiski gevur **15 ársverk**. Seta vit talið til **15.000 tons**, sum roykt kann verða av laksi, hýsu og svartkalva, gevur hetta **2.250 nýggj størv.**

Tað skal ikki nógv íløga til fyri at fáa øll hesi nýggju størvini, sum støðan er í landinum. Flakavirkini hava vit, ið fleiri eru stongd. Tey hava útgerð til frysting og kunnu lættliga fara undir at roykja fisk. Roykiovnur kostar 800.000 kr., sum kann roykja 2 - 2,5 tons um samdøgrið. Best er við tveimum sovorðnum ovnum, sum saman við skeri- og pakkitólum, vognum og saltimaskinu kosta einar 3 mió. kr.

Fyri hesa fløgu ber til at fáa fiskavirkini **í gongd aftur**, sum eru **steðgað**, og **nógv fólk aftur í arbeiði**, sum í dag ganga arbeiðsleys og ongan annan møguleika vita sær enn at flyta av landinum.

ES-sáttmálin kann verða ein trupulleiki fyri royktan fisk. Hann gevur okkum loyvi til 1.000 tons av royktari vøru, til vit renna okkum í loftið og kunnu **fáa 13%** í tolli. Tað er serstakliga marknaðin fyri royktum vørum, framleiðarar í ES vilja hava fyri seg sjálvar, ikki minst danir, sum tykjast at hava fyrimun av at halda okkum uttanfyri hendan marknað.

Framgongdin í framleiðsluni av royktum vørum er ikki stór, men kemur gongd á hesa framleiðslu, er neyðugt beinanvegin at taka upp samráðingar um at hækka loftið fyri fisk úr Føroyum. Hendan møguleikan hava vit í sáttmálanum, og danska stjórnin sigur í avtaluni frá 12. oktober 1993 seg framhaldandi vilja stuðla føroyingum til at fáa eina betri handilsavtalu, so at føroysk framleiðsla kann kappast á jøvnum føti á tí europeiska marknaðinum.

Ein annar møguleiki fyri at fáa uppaftur fleiri hendur í arbeiði her á landi, er fiskurin úr øðrum londum, sum kann verða virkaður á flakavirkjum okkara. Hesin tykist ikki

at vera nakar trupulleiki at fáa hendur á, um peningur var.

Trupulleikin liggur her í vantandi fígging og ringum marknaðarviðurskiftum, tí at ikki slepst inn á ES-marknaðin við úrdráttum úr 3-landsvøru uttan at gjalda upp til 20% í tolli.

Ein tollunión av tí slagi, sum ES hevur við fleiri onnur lond ella landspartar, sum hoyra til eitt ES-land, hevði opnað fyri nógvum møguleikum á virkjum okkara. Tí eigur at verða kannað, um tað ber okkum til at fáa eina sovorðna skipan, uttan at vit missa samráðingarrættin og nakað av tí sjálvsavgerðarrætti, sum vit hóast alt enn hava eftir.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið aftur tikið.

112 Tingskipan Føroya Løgtings

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði løgtingsformaðurin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir tingskipanina, sum tilmælt er av nevndini av tingformanninum, ið nú er, og tingformonnum, ið hava verið, í áliti um tingskipan Føroya Løgtings, dagfest 17. mars 1995, bls. 38 - 65.

Viðmerkingar:

Løgtingið samtykti á løgtingsfundi 25. juli 1994 í sambandi við endaligu samtyktina við 3. viðgerð í 2. umfari av nýggju stýrisskipannarlógini við 29 atkvøðum fyri og ongari atkvøðu ímóti hetta uppskot til samtyktar:

"Løgtingið setir nevnd við sitandi formanni í tinginum og fyrrverandi formonnum løgtingsins Lassa Klein, Anfinni Kallsberg, Jacob Lindenskov, Hergeiri Nielsen, Jógvani Sundstein, Agnari Nielsen og Hilmari Bech, at gera uppskot til broyting av tingskipan løgtingsins soleiðis, at tingskipanin m.a. samsvarar tí av løgtinginum í juni 1994 í fyrsta umfari og í juli 1994 í øðrum umfari samtykta uppskoti til løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. Álitið verður at leggja fyri løgtingið í seinasta lagi fyri árslok 1994."

Henda nevnd lat frá sær álit, nakað seinkað, hin 17. mars 1995 og sum eintak av er latið øllum tingmonnum.

Eftir galdandi tingskipan § 12, stk. 1, 2. pkt. skulu øll onnur uppskot enn løgtingslógaruppskot verða uppskot til samtyktar og skulu hava tvær viðgerðir. Løgtingsformaðurin er tó av teirri áskoðan, at eitt uppskot til tingskipan er so líkt uppskoti til løgtingslóg uttan at vera tað, tí at staðfesting løgmans og kunngerðing fyri almenninginum krevst ikki, at tá ið uppskotið fær viðgerð á løgtingi, fer hon at tilmæla, at uppskotið á tingi fær somu viðgerð sum løgtingslógaruppskot, t.v.s. 3 viðgerðir á tingi.

1. viðgerð 27. apríl 1995. Málið varð beint í serliga nevnd at viðgera tingskipanina, sum 30. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er framlagt av løgtingsformanninum tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 27. apríl 1995 beint í serliga nevnd at viðgera løgtingsmál nr. 112/1994 tingskipan Føroya løgtings.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er komin til ta niðurstøðu, at málið er so umfatandi, at ikki er gjørligt at geva tí eina nøktandi viðgerð í tí tíðarskeiði, nevndin hevur fingið til at leggja fram álit í málinum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjørn á Heygum, Vilhelm Johannesen, Helena Dam á Neystabø, Ingeborg Vinther, Anfinn Kallsberg, Tordur J. Niclasen og Lasse Klein) setir fram soljóðandi

I u p p s k o t

til

samtyktar

1. Nevndin mælir til, at løgtingið samtykkir framlagda uppskot.

2. Nevndin verður sitandi sum millumtinganevnd og leggur fyri tingi møguligar broytingar í løgtingsmáli nr. 112/1994 í komandi tingsetu.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson) kann ikki taka undir við meirilutanum, men leggur í staðin fram soljóðandi

II uppskot

til

samtyktar

Nevndin arbeiðir víðari við málinum, og leggur fram álit áðrenn nýggja stýrisskipanin kemur í gildi á ólavsøku 1995.

2. viðgerð 31. mai 1995. Uppskot løgtingsformansins samtykt við 23-0. Uppskot meirilutans til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum og uppskot minnilutans til samtyktar fall við 4-0 atkvøðum.

3. viðgerð Uppskotið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

113 Miðvísan landbúnaðarpolitikk í Føroyum fram til ár 2001 og ár 2006 - 5 og 10 ára ætlan í landbúnaðarøkinum

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting samtykkir:
At áleggja landsstýrinum saman við pørtum í landbúnaðinum at seta í gildið fyri Føroyar ein miðvísan landbúnaðarpolitikk fram til ár 2001 og ár 2006 - 5 og 10 ára ætlan á landbúnaðarøkinum, sum ber í sær, at Føroyska samfelagið í mest møguligan mun verða sjálvbjargið m.a. á hesum økjum:

I.

Á øllum økjum sum snúgva seg um mjólkarúrdráttir.

Á øllum økjum sum snúgva seg um seyðakjøtframleiðslu.

Á øllum økjum sum snúgva seg um neytakjøtframleiðslu.

Á øllum økinum sum snýr seg um eggjaframleiðslu.

Á økinum sum snýr seg um úrdráttir úr ull.

II.

Á økinum sum snýr seg um stráfóðurframleiðslu til seyð og neyt.

Á økinum sum snýr seg um eplaframleiðslu.

Á økinum sum snýr seg um grønmetisframleiðslur av fruktum sum eru egnaði til framleiðslu í Føroyum.

III.

At koma við uppskotum um aðrar møguleikar, sum ikki eru nevndir í hesum uppskotinum til samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum, at hava uppskotið klárt í seinasta lagi 1. januar 1996.

Viðmerkingar:

Tað er trupult at fáa eyga á ein miðvísan væl orðaðan landbúnaðarpolitikk í Føroyum, hóast møguleikar eru til staðar á mongum økum. Spurningurin er, um tað ikki er uppá hægstu tíð, at politisku myndugleikarnir og partarnir í landbúnaðinum finna fram til ein miðvísan landbúnaðarpolitikk, sum fevnir yvir eitt fimm og tíggju ára tíðarskeið.

Hvørji ynskir og krøv krevja politiskir myndugleikar, hvat krevja partarnir í landbúnaðinum, og hvat krevur samfelagið verður gjørt á landbúnaðarøkinum?

Hvørjir møguleikar eru, og hvat kann gerast, og hvørjar fortreytir skulu verða til staðar fyri at náa úrslit og endamál á landbúnaðarøkinum?

Tað kann av røttum verða spurt, hví hava vit føroyska landbúnaðarframleiðslu, og hví hava vit føroyskan landbúnað? Hvør er meiningin við hesum í dag og hvør verður

meiningin við hesum í framtíðini?

Sambært tjóðarroknskapin fyri 1988 er partur landbúnaðarin av bruttofaktorinntøku Føroya 65 mió kr. ella 1,1%. Framleiðslan sum liggur til grund aftanfyri hesa útroking er: Mjólk, kjøt, egg, eplir, og grønmeti umframt stráfóður, men hóast hetta hava lønarútgjaldingarnar ikki verið stórar 4 mió. kr.

Flest allir partar eru samdir um, at bruttofaktorinntøkan kann økjast heilt munandi, umframt at fleiri fólk aftrat kunnu fáa arbeiði í landbúnaðarvinnuni, um rætt verður atborið og er hetta tí eisini orsøkin til hetta uppskotið. Í hesum døgum, har støðugt vaksandi arbeiðsloysi ger seg galdandi, vildi henda vinna í nógv størri mun skapt fortreytir hjá mangari framilju fyri lønandi virksemi.

Ætlanin er, at hetta uppskotið skal føra við sær eina samlaða virðisøking í landbúnaðinum uppá uml. 85 mió. kr. árliga tá framleiðslan er komin í hæddina, og eru høvuðstættirnir í uppskotinum hesir:

MJÓLKARÚRDRÁTTIR.
Samskipanin av mjólkaframleiðsluni í Føroyum hevur eydnast sera vel og kann bygnaðurin sum slíkur brúkast sum fyrimynd fyri hvussu fram skal farast tá hugsað verður um aðrar møguleikar innan landbúnaðin.

Mjólkarframleiðslan er vaksin nógv uppá stutta tíð úr 3 mió liturin í 1981 upp í 5,45 mió litrar í 1989, ella ein vøkstur uppá 55% eftir bert 8 árum.

So gott sum øll mjólk, ið verður seld í Føroyum, verður seld um Mjólkarvirkið Búnaðarmanna, ið hevur 95 aktivar lutaeigarar. Skal framleiðslan økjast ella standa í stað, so er eisini neyðugt at hugsa um aðrar møguleikar. Aðrir møguleikar eru í gongd t.d. jogurt, ostur og rómi. Men tað verður framvegis innflutt drekkimjólk, umframt aðir mjólkarúrdráttir sum eins væl kundu verið framleiddir í Føroyum, og fyri 1992 hesir vørubólkar:

Smør	207.421 kg	kr. 3.477.828
Jogurt o.a	171.972 kg	kr. 1.959.840
Ostur	482.983 kg	kr. 11.154.529
Drekkimjólk	1.008.121 kg	kr. 3.171.155
Turrmjólk	56.501 kg	kr. 920.795
Samanlagt		kr. 20.684.147

SEYÐAKJØTFRAMLEIÐSLA

Er leysliga ætlað út frá hagtølunum í Árbókunum fyri Føroyar: 70.000 áseyðir og 0,7 seyðir at drepa fyri hvønn áseyð. Um hvør dripin seyður viðgar 12,5 kg gevur tað 0,7 x 70.000 x 12,5 kg = 595 tons.

16.000 heimaær og 1,6 seyðir at drepa fyri hvørja heimaær. Um hvør dripin heimaseyður vigar 16 kg, gevur tað 1,6 x 16.400 x 16 kg = 419,8 tons.

Samlaða føroyska framleiðsla:1.015 tons árliga.

Í 1992 innfluttu vit 549.100 kg av seyðakjøti til eitt samlað virði uppá 10,2 mió. kr.

Mett verður ikki at trupulleikar standast av, at framleiðslan av føroysum seyðakjøti verður økt við umleið 500 tonsum aftrat árliga, so at vit gerast sjálvbjargin á økinum.

NEYTAKJØTAFRAMLEIÐSLA.

Framleiðslan av føroyskum neytakjøti í 1992 var uppá 109.225 kg, meðan vit í sama tíðarskeiði innfluttu 992.000 kg av neytakjøti fyri eitt samlað virði uppá 12 mió.kr. Mótvegis mjólkarsøluni hevur gingist illa at selja føroyska neytakjøti fyri lønandi pris, og er orsøkin m.a. eisini bíligt innflutt kjøt úr ES.

Framleiðslan av føroyskum neytakjøti kann økjast munandi uttan trupulleikar, og tí eigur at verða gjørd ein serstøk skipan á økinum, sum ger okkum førar fyri at økja framleiðsluna upp til 50% av vnýtsluni ár 2001, og eina ætlan yvir hvussu vit gerast sjálvbjargin á økinum ár 2006.

EPLAVELTING.

Eplir vaksa væl í Føroyum, men trupulleikin er at fáa raksturin at bera seg, serstakliga um talan verður um vinnuligt endamál. Men lítil ivi tykist verða um at royndarbrúk eiga at verða skipaði. Eplainnflutningur í tonsum hevur verið hesin

	1990	1991	1992	
Seteplir	53,3	120,7	76,6	
Eplir	2.481,3	2.446,3	3.038,6	2.655 t.
Annað	46,7	18,3	114,6	
samanlagt:	2.581,3	2.584,3	3.229,4	2.799 t.

Tað eru nógv viðurskiftir sum ávirka, hvussu nógv eplir fáast úr hvørjum veltum hektara av eplaveltu, og fyri at meta leysliga um, hvussu nógv eplir fáast til sølu úr einum ha, kann verða hugt at okkara grannum:

Yvirlit yvir eplaúrtøku pr. ha (tons)

Norra	15,2	-22,5 tons
Danmark, totalt	32,4	-55,0 tons
Danmark:35/55 mm	22,3	-43,0 tons
Royndarstøðin, Kollafj.	02,9	-20,0 tons
Royndarstøðin, Sand	34,5	-74,8 tons

Út frá hesum kann ætlast, at í Føroyum fáast møguliga 30 tons at selja úr hvørjum hektara, og fyri at fáa 2.655 tons krevst, at minst 2.655/30 =88,5 hektarar verða veltir til eplir. Og tá helst skulu ganga nøkur ár ímillum at eplir verða sett niður í sama stykkið, so krevst at ikki minnið enn 3 - 5 x 88,5 ha = 265,5 - 442,5 ha eru, sum kunnu brúkast til eplavelting.

GRØNMETISVELTING.

Nógv grønmeti verður keypt til landið, sum eins væl kundi verið velt her á landi, t.d. hesi fyri 1992:

Hvíttkál-reyðkál	121.676 kg	kr. 402.000
Leykir	176.149 kg	kr. 698.000
Salat/kál	22.581 kg	kr. 246.000
Gularøtur	273.441 kg	kr.1.093.000
		kr.2.439.000

Umframt:		
Agurkir	86.560 kg	kr. 910.000
Fryst grønmeti	211.444 kg	kr.1.863.000
Tomatir	107.051 kg	kr.1.256.000
Purrur, blomkál	72.382 kg	kr. 586.000
Samanlagt:		kr.7.054.000

Ein hektar av landbúnaðarjørð kann framleiða umleið 35 tons av gularótum, ella 10-20 tons av káli. Tað vil siga, at skulu einar 30 - 40 ha av landbúnaðarjørð til fyri at velta mesta partin av fyrr nevndu vøkstrum. Verður fyrivarni tikið fyri skift av vøkstri, so skulu einir 150 ha av góðari landbúnaðarjørð til, og fyri at toyggja vakstrartíðina er neyðugt at lata vakstrarhús taka sær av at fáa vøkstirnar at næla, so at heystast kann tíðliga á arinum. Tað er nokk eingin trupulleiki at skipa fyri hesum, bert skulu vakstrarhúsini hava tað at vita í rímiligari góðari tíð.

NIÐURSTØÐA

Í hesum uppskotinum er ikki nomið við fleiri aðrar týðandi spurningar í sambandi við lanbúnaðarviðurskiftir; um lóggávuna, íløgur, fígging, skuld, skattaviðurskiftir, umhvørvi, garðarnir og festini, viðurskiftini hjá umsitingarlugu myndugleikunum, tænastur, sláturvirkir o.s.fr. Tað var heldur ikki ætlanin í hesum umfarinum, tí mett verður, at hesir spurningar heilt av sær sjálvum verða viðgjørdir tá uppskotið til samtyktar er samtykt.

Í longri tíð hevur landbúnaðarvinnan havt eitt objektivt og gott orðaskifti um neyðugar broytingar, og ætlanin er, at hetta uppskotið skal verða ein lítil, men týdningarmikil partur av menningini og landbúnaðarviðurskiftunum í Føroyum.

Tað er eisini neyðugt, um sámiligt lív skal verða lagað fyri landbúnaðinum í Føroyum í framtíðini, at allir partar, sum varða av vinuni, seta seg saman og samráðast um eina

mansømuliga loysn fyri framtíðina hjá landbúnaðinum sum heild.

Tað má førast ein landbúnaðarpolitikkur, sum stuðlar mest møguligari framleiðslu av landbúnaðarvørum. Eitt nú neyta- og seyðakjøt, eplir, grønmeti, úrdráttir úr ull v.m. og tað má førast ein strangur íløgupolitikkur, sum fremur best møguligan gróðrarbotn fyri ta framleiðslu, sum skal framleiðast her á landi.

Tað er eisini neyðugt at skipað fyri strangari góðskumetan og sølupolitikki, soleiðis, at føroyskar landbúnaðarvørur verða keyptar fram um aðrar, og neyvan nakrantíð hevur tað verið meira neyðugt, at standa saman um landbúnaðarvinnuna enn júst í hesum tíðum.

1. viðgerð 3. mai 1995. Málið varð beint í landbúnaðarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum tann 18. apríl 1995.

Við 1. viðgerð tann 3. mai 1995 varð málið beint í landbúnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Til viðgerðina hevur nevndin eisini havt fund við Óla Jacobsen, landsstýrismann í landbúnaðarmálum og stjóran á Føroya Jarðarráð, Jóannes Dalsgarð.

Á fundinum greiddi Jóanes Dalsgarð frá, at høvðusuppgávan hjá Føroya Jarðarráð var:

a. umsita kongsjørðina
b. umsita jarðargrunnin
c. studningsskipaninar

Uppgávurnar hjá Jarðarráðnum í dag vóru í høvðusheitum, at meta um ætlanir frá máli til mál, og metti annars tørv verða á einum politiskum málsetningi á landbúnaðarøkinum, og uppá fyrispurning metti hann góðar møguleikar vera at økja talið á fólki í landbúnaðarvinnuni.

Óli Jacobsen, landsstýrismaður greiddi frá, at í løtuni situr ein nevnd, sum viðgerð vinnuligan landbúnað, soleiðis at vit fáa ein miðvísan landbúnaðarpolitikk við tí fyri eyga, at menna landbúnaðin sum heild, og metti tí tað vera rætt at skunda undir hetta arbeiði.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Álvur Zachariassen, Henrik Old, Jákup Lamhauge og Óli Breckmann) tekur

ikki undir við uppskoti Kristiliga Fólkaflokksins.

Ístaðin setur meirilutin fram fylgjandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Í sambandi við ta nevnd, sum viðgerð vinnuligan landbúnað, soleiðis at vit fáa ein miðvísan landbúnaðarpolitik við tí fyri eyga, at menna landbúnaðin sum heild, hevur landbúnaðarnevndin viðgjørt henda spurning saman við hesum løgtingsmáli.

Landbúnaðarnevndin heitir tí á landsstýrið, at skunda undir arbeiði hjá hesi nevnd, soleiðis, at hon kann koma við tilmæli til Løgtingið, hvussu ein fyrireiking skal fremjast í framtíðini.

Løgtingsmál nr. 113/1994 verður at handa hesari nevnd, sum ein liður í viðgerðini hjá nevndini.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur í fyrstu syftu undir við uppskoti Kristuliga Fólkaflokksins. Í øðrum lagi undir við uppskotinum hjá meirilutanum.

2. viðgerð 30. mai 1995. Uppskotið fall við 13-0 atkvøðum. Uppskot meirilutans til samtyktar samtykt við 22-0 atkvøðum.

114 Krígsendurgjald fyri føroyingar mynstraðir við útlendskum fiskiskipi

Ár 1995, hósdagin 20. apríl 1995 legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya Løgting áleggur Føroya Landsstýri:

At taka upp samráðingar við donsku stjórnina um broyting av tulkingini av "Lov om ændring af lov om erstatning til besættelsestidens ofre" soleiðis, at eistni teir fáu føroyingar, sum vóru mynstraðir við íslendskum fiskiskipum, og sum harvið fiskaðu út frá sameindarí havn "med henblik på tilførsel af krigsforsyninger til allieret havn" somuleiðis fáa hesa siglingartíð góðkenda.

Viðmerkingar:

Í mong ár vóru føroyskir sjómenn fyri vanbýti, tá ið talan var um krísendurgjald - ella pensjón fyri teirra leiklut undir seinra heimsbardaga 1940 - 1945.

Í fjør fingu so flestir føroyingar viðurkenning fyri teirra leiklut uttan nakrir heilt fáir føroyingar, sum vóru mynstraðir við íslendskum skipum.

Orsøkin til hetta er at finna í "Lov om ændring af lov om erstatning til besættelsestidens ofre (færøske fiskere), har tað stendur í § 1 c: "Det er en betingelse, at sejladsen har fundet sted i krigsfarvand med henblik på tilførsel af krigsforsyninger til allieret havn uden for Færøerne."

Hendan broyting í lógini førdi við sær, at føroyingar, sum vóru mynstraðir við íslendskum skipum, ikki fingu mynstringartíðina roknaða upp í siglingartíðina undir krígnum, og mistu teir harvið rættin til krígsendurgjald á sama støði sum aðrir føroyingar.

Danskir sjómenn, sum fiskaðu við íslendskum skipum, fingu endurgjald, men ikki teir fáu føroysku sjómenninir, sum sigldu við íslendskum skipum.

Føroyingar við útlendskum skipum, sum sigldu út frá sameindari havn, og fiskur teirra varð aftur fluttur við føroyskum skipum til Onglands. Teir fáu føroyingar, talan her er

um, eiga tí at fáa endurgjald á sama hátt sum eitt nú danir.

1. viðgerð 26. apríl 1995. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 20. apríl 1995.

Við 1. viðgerð tann 26. apríl 1995 varð málið beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Ein samd nevnd tekur í princippinum undir við málinum, tó soleiðis, at nevndin metir, at Landsstýrið eigur at kanna spurningin fyrst áðrenn samráðingar verða tiknar upp við dansku stjórnina.

Tí setur **ein samd nevnd** fram fylgjandi

broytingaruppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at kannað málið. Um so er, at grundarlag er fyri tí so at taka upp samráðingar við dansku stjórnina um broyting av tulkingini av "Lov om ændring af lov om erstatning til besættelsestidens ofre".

Hetta fyri, at eisini teir fáu føroyingar, sum vóru mynstraðir við íslendskum fiskiskipum, og sum harvið fiskaðu út frá sameindari havn "med henblik på tilførsel af krigsforsyninger til allieret havn" somuleiðis fáa hesa siglingartíð góðkenda.

2. viðgerð 1. juni 1995. Uppskot nevndarinnar samtykt við 32-0 atkvøðum, upprunauppskotið afturtikið.

115 Frískúlalóg

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at fyrireika uppskot til lóg um frískúlar í Føroyum og leggja uppskotið fyri ólavsøkutingið 1995.

Viðmerkingar:

Í fleiri ár hevur ynski tikið seg upp her á landi um frískúlar, uttan at tað hevur eydnast at fingið frískúlar settar á stovn, hóast løgtingslóg nr. 21 frá 22. mars 1979 heimilar at seta á stovn frískúlar og privatar skúlar. Avmarkingin er so stór í orðunum: "har serligur tørvur er", at hetta hevur virkað sum ein stór forðing.

Hetta er tí orsøkin til, at Kristiligi Fólkaflokkurin heldur tað vera rætt at fáa serstakar lógarkarmar á økinum, sum opna fyri møguleikunum. Hetta verður gjørt, hóast flokkurin hevur annað uppskot, har mælt verður til at taka alt undirvísingarverkið upp til nýggja viðgerð.

Vísast kann t.d. á ynski hjá Eftirskúlafelagnum, sum endaði við at farið varð til Danmarkar við skúlanum, tí at ynski teirra fekk ikki sømdir frá skúlamyndugleikunum her heima á landi, hóast tørvurin var eyðsýndur.

Eisini aðrir sjálvbodnir felagsskapir hava reist spurningin um frískúla, men hvørja ferð hevur tað verið til fánýtis.

Í grannalondum okkara hava teir frískúlar, ið tað almenna stuðlar, og serliga frískúlalóg, sum Kristiligi Fólkaflokkurin heldur tíðina nú vera komna til, at vit her á landi fara undir at fyrireika og seta í verk. Í t.d. Keypmannahavn gongur fjórði hvør næmingur í frískúla, og í øllum Danmark er talan um 20% av næmingunum, sum fáa undirvísing á frískúlum.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 22. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 20. apríl 1995, og varð við 1. viðgerð tann 24. apríl 1995 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan A. Johannessen, Finnbogi Arge, Kristian Magnussen og Signar á Brúnni) tekur ikki undir við málinum.

Meirilutin heldur, at sum støðan í samfelagnum er, eiga vit at ansa eftir, at verðandi skúlaskipan ikki verður veikari, og verður tí einki uppskot sett fram.

Minnilutin (Óli Breckmann) førir fram, at ein virkin frískúlaskipan hevði tryggjað:

1. Foreldrum og næmingum møguleika at velja annan skúla, um tey yneskja serskilda frálæru, vitan og andligan førning út um tað, sum almenni eindarskúlin veitir.

2. Samfelagnum betri gagnnýtslu burtur úr teim uml. 500 mió. kr., sum verandi almenna skúlaverk kostar landi, stati og kommunum árliga, svarandi til 50.000 kr. pr. næming pr. ár, um skúlarnir sluppu at skipa seg innihaldsliga og hvør sær noyddust at kappast um næmingar og lærarar við útboði og eftirspurningi.

3. Hægsta frálærustøðið fyri lægri kostnað um almenna peningajáttanin til skúlaskap fór at fylgja næminginum við eini gjaldsváttan til útbúgving, sum eins og eitt "klippikort" umboðaði t.d. helvtar- ella tveirtriðingskostnaðin av frálæruni í eitt skúlaár.

Samsvarandi hesum málsetningum setir fólkaflokkurin fram sítt egna broytingaruppskot (eisini lagt fyri løgtingið í tingsetuni 93) um rammulóg fyri frískúlar til hetta uppskot til samtyktar við fylgjandi grundgevingum:

Lærdómur er lættur at bera. Høgt útbúgvingarstøði er ein hornasteinur undir trivnaði og menning hjá landsins borgarum einsæris og samfelagnum sum heild. Føroyingar hava roynt at hildið okkum á hædd við okkara grannalond í tann mun, fólkagrundarlag, lærarakreftir og fíggjarorka hava loyvt tí.

Mótsett øðrum londum hava vit sjálvi bert rindað helvtargjald av tí, sum skúli og útbúgving í Føroyum hava kostað. Danir hava goldið hin helmingin. Hetta uppskot hevur ikki til endamáls at broyta hetta tvíbýtið, men forðar heldur ikki fyri, at kostnaðarbýtið verður broytt.

Heldur miðar uppskotið ímóti at fleirtátta møguleikarnar hjá foreldrum at velja tann skúla, ta útbúgving, siðvenju, átrúnað og frálærutinnihald, sum best verður tryggjað í eini frískúlaskipan við sjálvstøðugum skúlum á øllum aldurstigum, har foreldur og

lærarar, sum ynskja at leggja meir í skúlaskipan enu minstakrav landsmyndugleikanna, fáa høvi til tess.

Eisini hevði ein frískúlaskipan lært okkum at fingið mest innihaldsvirði fyri tann pening, sum okkara samfelag nýtir til at menna kunnleikastøði ungdómsins.

Ein holl skúla- og útbúgvingarskipan kostar einum samfelag nógvan pening. § 14 á løgtingsfíggjarlógini, "Útbúgving og gransking" leggur hald á yvir 371 mió. kr. í hesum fíggjarári. Tað er 4 mió. kr. meiri enn í fjør, hóast næmingatalið er fallið. Harumframt kemur kommunanna íkast, sum í fleiri førum umboðar størstu einstøku fíggjarskyldu teirra.

Siga vit, at skúlaskapur falt kostar upp ímóti 500 mió. kr. árliga, og at tað eru uml. 10.000 føroyingar í útbúgving á øllum aldurstigum frá 1. flokki í barnaskúlanum upp til handils- ella studentaskúla, kostar hvør næmingur uml. 50.000 kr. árliga.

Eyðvitað kostar hvør eldri næmingur meir enn hvørt barn í fólkaskúlanum, men tað er hugvekjandi, at ein miðal føroysk skúlastova við t.d. 15 næmingum umboðar ein samfelagskostnað ella "fløgu" upp á 750.000 kr. árliga (svarandi til 4 ársinntøkur hjá einum tímalønum ella 3 árslønir hjá einum lærara).

Hugsanin við hesum uppskoti er, at foreldur at skúlabørnum fáa størri valfrælsi til útbúgving. Foreldur at børnum í skúlaaldri (seinni næmingurin sjálvur) fáa eftir hesum uppskoti eina gjaldsváttan frá myndugleikunum við skúlaársbyrjan, sum tey kunnu lata tí skúla, tey velja til síni børn. Váttanin kann vera verd t.d. helvtar- ella tveir-triðingsgjald fyri tað, sum tað kostar í miðal at útbúgva ein næming árliga. Hetta gjaldspróg kann skúlin so innloysa á gjaldstovuni aftur fyri reiðan pening at fíggja (frí)skúlans virksemi við og fáa restina av játanini útgoldna sum higartil eftir næmingatali. Gjaldsváttanin kann bert í hesum føri gjalda fyri útbúgving.

Henda uppskotna skipan hevði fört til, at tað verður gjørligt hjá hvørjum (frí)skúla sær at arbeiða meiri innanhýsis við at fáa eitt so gott og dámligt innihald fyri næmingar og foreldur sum gjørligt. Dugnaligar skúlaleiðslur høvdu fingið meir útbúgvingarvirði fyri pengarnar og kundu handlað fríari innanhýsis við býtinum av inntøkum sínum til tær ymsu útreiðslurnar, (frí)skúlin hevur.

Verandi almenna eindarskúlaskipan gevur onga vissu fyri bestu gagnnýtslu av tí stóra skattfíggjaða tilfeingi, sum "Útbúgving og gransking" í dag leggur hald á. Allur skúlaskapur verður skorin eftir sama leisti. Seinasta skipið í konvoyini avger ferðina hjá øllum. "Øðrvísi" næmingar við serligum gávum til ávísar lærugreinar verða hildnir aftur av teim seinføru.

Somuleiðis eru óskikkaðir lærarar lægsti felagsnevnari og halda næmingum niðri á tilsvarandi kunnleikastøði. Góðir lærarar hava sum er ongan rætt til betri inntøkur enn vánaligir lærarar. Tað er lítið avrikseggjandi og órættvíst móti góðum lærarum og uppalarum. Ein vána lærari kann fordøma eftir verandi skúlaskipan eitt heilt bygdasam-

felag til drumbar í fleiri ættarlið av skúlabørnum. Tí er neyðugt við eini frískúlaskipan. So neyðast foreldur og børn ikki sum nú uttan valfrælsi at góðtaka vánaligar skúlar og fáa møguleika at leita aðrastaðni fyri at tryggja børnum betri frálæru.

Ein kanning, sum landsskúlafyrisitingin herfyri kunngjørdi, vísti, at 20% av øllum føroyingum duga ikki at lesa. Kann vera, at henda kanning var ætlað at trýsta løgtingið til at hækka játtanina á fíggjarlógini til skúlaverkið fyri 1995. Men, er 5. hvør føroyingur analfabetur, so freistast ein at spyrja, hvat annað hesi 20% av Føroya fólki hava fingið skúlatíðina at gingið við, tí øll onnur innlæring er treytað av lesiførleika. Hví er løgtingið ikki kunnað fyrr um, at tær 5 mia. kr., sum skúlaverkið hevur kostað farnu 20 árini, eru so illa gagnnýttar, at 5. hvør føroyingur er ólesin.

Verandi skúlaskipan er innrættað og lønarlagið skipað so, at tað eggjar ikki skúlum og lærarum til nýhugsan. Fingu lærarar samsýning eftir avrikum, ágrýtni og evnum at læra frá sær, kom meiri burturúr hjá teimum, ið mest spentu seg út. Henda avløningarskipan er galdandi fyri allan tann vinnuliga partin av búskapinum, framleiðslu, handverk, handil og tænastur. Hví so ikki eisini fyri almenna sektorin?

Hetta gerst best, um skúlin verður innrættaður so, at foreldur (og tilkomnir næmingar) fáa fíggjarligt valfrælsi til at senda síni børn til tann skúlan, sum tey halda gevur børnunum hollastu útbúgving fyri peningin. Tann rætt hava borgarar sum brúkarar í flestu øðrum viðurskiftum og áttu eisini at fingið hann í skúlavalinum til børnini.

Um vit løgdu skúlaverkið undir eitt slag av marknaðarskipan, hevði samfelagið í longdini ikki bert fingið meiri fyri tann prís, ið útbúgvingin kostar, men eisini spart pening umsíður.

Betri hylling hevði fingist á, hvat skúlaskapur veruliga er verdur í peningi. Verandi 50.000 kr. árliga fyri hvønn næming í miðal ljóðar nevniliga í hægra lagi, sammett við so mangt annað.

Viðvíkjandi skúlahølum er at siga, at fíggjarkreppan, sum er orsakað av tí sama førda politikki sum higartil, rekur vaksandi tal av barnafamiljum av landinum. Tað verður rúmligari í fleiri skúlum, og nakrir verða helst niðurlagdir ella til avlops um stutta tíð. Tað skuldi givið møguleika hjá frískúlum, ið verða stovnaðir sum sjálvseigandi stovnar eftir hesi lóg, at fingið innivist í egnaðum hølum.

At mæla ímóti privatum skúlum við at vísa á § 26 í verandi fólkaskúlalóg, sum - tambað - sigst heimila ávísum virksemi av ymiskum slagi, sum ber á brá av frískúlum, er undanførsla, av tí at enn er einki loyvi givið til frískúlar í Føroyum. Bert er henda § 26 blivin til eitt starv á landsskúlafyrisitingini.

Eindarskúlaskipanin ger tað lættari bert at leggja støðið eftir lægsta felagsnevnara og halda somu kós, meðan øll lond uttan um okkum hava frískúlar og privatar grundskúlar umfram líknandi valfrælsi fyri miðnámsútbúgvingar. Havast má í huga, at kappingarneytar okkara í Fjareystri strúka fram við okkum í skúlaskapi, sum galt tað lívið (ið tað

eisini ger).

Argumentið um, at skúlaskapur verður dýrari við eini friskúlaskipan, er høpisleyst av tí, at talan er um sama tal av næmingum sum higartil, samstundis sum kapping um næmingar millum skúlarnar drívur kostnaðin av frálæruni niður. Marknaðartreytað rationalisering við útboði og eftirspurningi, altso kapping um næmingar og lærarar hevði hækkað skúlaskap og kunnleikastøði til frama fyri alt samfelagið.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

u p p s k o t

til

løgtingslóg um friskúlar og privatar grundskúlar.

§ 1.

Einstaklingum, samkomum, felagsskapum o.ø. er loyvt smbr. hesi rammulóg at seta á stovn friskúlar og privatar grundskúlar, framhaldsdeildir og miðnámsútbúgvingar.

§ 2.

Landsstýrið góðkennir stovnsetan av slíkum skúlum eftir somu reglum um m.a. kostnað, næmingatal, lærarakreftir og hølisumstøður, sum eru galdandi fyri almennu skúlarnar.

§ 3.

Hesir friskúlar skulu í minsta lagi lúka frálærukrøv og prógvstøði fólkaskúlans, men eru annars fritt stillaðir at leggja aftrat innihaldinum smbr. serskildum endamálum friskúlanna.

§ 4.

Landsskúlafyrisitingin hevur skyldu at stuðla við serundervísing, vegleiðing, frálærutilfari o.ø. í vanligum lærugreinum, har leiðsla hins einstakra friskúlans ynskir tað.

§ 5.

lagtingslov om friskoler og private grundskoler.

§ 1.

I henhold til denne rammelov er det tilladt enkeltpersoner, forsamlinger, fællesskaber o.a. at etablere friskoler og private grundskoler, fortsættelsesafdelinger og centraluddannelser.

§ 2.

Landsstyret godkender etablering af sådanne skoler efter samme regler om bl.a. bekostning, elevtal, lærerkræfter og lokaleforhold, som er gældende for de offentlige skoler.

§ 3.

Disse friskoler skal i det mindste opfylde folkeskolens undervisningskrav og folkeskolens eksamensgrundlag, men er ellers fritstillet at udvide indholdet i henhold til friskolernes formål.

§ 4.

Landsskoleadministrationen har pligt til at støtte med specialundervisning, vejledning, undervisningsmateriale m.m. i sædvanlige fag, hvor den enkelte friskoles ledelse ønsker det.

§ 5.

Møgulig bygging ella leiga av egnaðum skúlahølum verður fíggjað av løgúngi og kommunum á sama hátt og í sama mun sum verandi almennir skúlar.

§ 6.

Raksturin til hesar skúlar verður fíggjaður á tann hátt, at almenn gjaldsváttan frá landi og kommunum, sum svarar til verandi kostnað av frálæru pr. næming í almennu skúlunum, verður latin foreldrum, t.e. fylgir barninum, og kann bert brúkast til hetta frálæruendamál.

§ 7.

Frískúlarnir hava roknskaparskyldu sum almennir skúlar o.a. stovnar.

§ 8.

Foreldraráð og lærarar hava í felag ábyrgd av rakstri og frálæruni á hesum frískúlum.

§ 9.

Skúlastjórin hevur ábyrgd av dagliga rakstrinum og roknskaparskyldum hjá frískúlanum.

§ 10.

Fylgilógir og reglugerðir verða gjørdar sambr. hesi rammulóg í tráð við líknandi frískúlar í grannalondum okkara.

§ 11.

Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

Eventuel opføring eller leje af egnede skolelokaler financieres af lagtinget og kommunerne på samme måde og i samme forhold som værende offentlige skoler.

§ 6.

Driften af disse skoler financieres på den måde, at offentlig kvittering fra landet og kommuner, som svarer til værende bekostning af undervisning pr. elev i de offentlige skoler, udleveres forældrene, d.v.s. følger med barnet og kan kun bruges til dette undervisningsformål.

§ 7.

Friskolerne har regnskabspligt som offentlige skoler o.a. institutioner.

§ 8.

Forældreråd og lærere har i fællesskab ansvar for driften og undervisningen på disse friskoler.

§ 9.

Skoledirektøren har ansvaret af den daglige drift og friskolens regnskabspligt.

§ 10.

Følgelove og reglementer formuleres i henhold til denne rammelov sammenlignet med friskoler i vores nabolande.

§ 11.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

2. viðgerð 24. mai 1995. Uppskotið fall við 6-0 atkvøðum. Uppskot minnilutans fall við 6-0 atkvøðum.

116 Stovnsetan av føroyskari viðskiftastovu og setan av føroyskum umboðsmanni í Bruxelles

Ár 1995, mikudagin 26. apríl legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at seta á stovn føroyska viðskiftastovu og seta føroyskan umboðsmann í Bruxelles, sum kann røkja áhugamál okkara við ES-londini og veita vinnulívinum allar neyðugar upplýsingar í samhandli okkara og samskifti við hesi lond.

Viðmerkingar:

Meira enn 70% av útflutningi okkara er í løtuni til londini í ES, umframt at innflutningur frá ES eisini er rættiliga stórur.

Endamálið við einari avtalu við hesi lond má vera tann, at miðað verður ímóti at fáa økt um útflutningsmøguleikar fyri føroyskum og útvegað føroyskum fiskavørum betri sømdir á europeisa marknaðinum.

Tørvurin á einari viðskiftastovu og einum føroyskum umboðsmanni í Bruxelles er eyðsýndur á sama hátt, sum vit í dag hava eina viðskiftastovu og umboðsmann í Aberdeen og Keypmannahavn, sum landskassin einsamallur ber allan kostnaðin av.

Vinnulívið í Føroyum hevur áður fleiri ferðir víst á hendan tørv, uttan at nakað kortini er hent í hesum máli. Tað metist at vera
ein neyðug fortreyt, at vit frá føroyskari síðu hava ein stovn, sum burtur av kann taka sær av upplýsingarvirkseminum og at gera arbeiðið á staðnum fyri føroyskum út- og innflutningi.

1. viðgerð 3. mai 1995. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki 12. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 3. mei 1995 beint í marknaðarnevndina.

Málið er viðgjørt í marknaðarnevndini, og undir viðgerðini hevur marknaðarnevndin kannað, hvat Føroya løgting samtykti í mars 1992 í sambandi við løgtingsmál nr. 110/1991: Stovnsetan av føroyskari viðskiftastovu og setan av umboðsmanni í Bruxelles. Tá samtykti løgtingið við 19-0 atkvøðum at "Heitt verður á landsstýrið at virka fyri, at føroyingar so skjótt sum gjørligt fáa stovn ella stovu í Bruxelles, sum kann taka sær væl av teimum viðurskiftum, sum Føroyar hava at greiða har, nú samskiftið við ES heilt greitt verður meira enn frammanundan við høvuðsborgina í Bruxelles".

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og 3 minnilutar.

Vísandi til hesa løgtingssamtykt og vísandi til, at nevnd er sett at kanna, á hvønn hátt Føroyar fáa betrað handilsviðurskifti okkara við ES, tekur **meirilutin** (Helena Dam á Neystabø, Jógvan A. Johannessen, Kristian Magnussen og Jákup Lamhauge) ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin (Bjarni Djurholm) tekur undir við uppskotinum.

Minnilutin (Jenis av Rana) tekur undir við uppskotinum.

Minnilutin (Jógvan Durhuus) tekur ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið fall við 7-0 atkvøðum.

117 Havbit og loyvi til veiðu við gørnum eftir laksi á firðum og sundum við bátum undir 20 br. reg. tons í august og september (Møguleikar fyri nýggjum arbeiðsplássum.)

Ár 1995, hósdugin 20. apríl legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

I **Álagt verður landsstýrinum at gera reglur fyri at sleppa fisk út á havbit.**

II **Álagt verður landsstýrinum at gera reglur fyri veiðu við gørnum eftir laksi á firðum og sundum til eitt avmarkað tal av bátum undir 20 br. tons í august og september.**

Viðmerkingar:

Tað hevur verið roynt í Føroyum at slept laksasmolti út á havbit, men hesar royndir linkaðu og steðgaðu heilt upp eftir útsetingina í 1990.

Yvirlitið yvir laksasmolt, sum higartil hevur verið slept á havbit í Føroyum, er hetta:

1985:	40.000 stk.
1986:	60.000 stk.
1987:	27.000 stk.
1988:	65.000 stk. (slept í Fámjin)
1989:	25.000 stk. (slept í Leynum)
1990:	15.000 stk. (slept í Leynum)

Sjálvt um eingi nágreinilig tøl eru til taks, verður mett, at 10% koma aftur av tí føroyska laksinum, sum út verður sleptur. Tað er meira enn í Noregi, men føroyski laksuriu tykist ikki vaksa eins væl og tann norski. Norski laksurin er eftir 1 ár verðin 2,4 kg, hin føroyski bara 1,7 kg.

Laksurin, ið sleptur verður út á havbit, heldur til norðan fyri Føroyar, har tann heiti og kaldi sjógvurin møtast. Her er umframt hin føroyska bæði norskur, svenskur, íslendskur og bretskur laksur.

Hesin laksur leitar aftur henda veg, tá ið hann verður gýtingarførur, fyri at sleppa niðan

í áirnar, og kann veiða eftir honum gerast eitt gott ískoyti hjá útróðrarmonnum.

Her kann eisisni ferðamannavinnan verða havd í huga, tá ið hon fer at menna seg og krevur at hava tilboð til hini ferðandi sum t.d. at sleppa á flot, veiða laks og annan fisk, uttan at hetta ávirkar fiskastovnin stórvegis.

Hóskandi kann tá eitt laksagjald verða ásett, sum tað var fyri skipini, ið veiddu laks norðanfyri upp á 1 kr. fyri hvørt kg, ið fór í ein laksagrunn at fíggja útseting v.m.

Í grannalondum okkara verður nógv gjørt við at sleppa fiskayngli út á havbit. Stjórnin í Noreg samtykti eftir tilmæli frá stórtinginum í 1990 at fara undir havbitsætlanina PUSH (Program for Utvikling og Stimulering av Havbeite). Bara í 1992 vóru játtaðar 34 mió. kr. til PUSH-ætlanina.

Roynt verður við laksi, rækjum, toski og hummara, ið verða slept út á havbit. 400.000 av toskayngli vórðu slept út í 1991, 340.000 laksasmolt í 1992, og 60.000 hummara-ungar verða hvørt ár settir út í Suður-Noregi. PUSH-ætlanin gongur til 1997/98.

Størsta laksaveiðutjóð í heiminum er Alaska, sum USA keypti frá Ruslandi í 1867 fyri 7 mió. dollars. Har vórðu veidd í 1991 heili 330 túsund tons av laksi. Meiri enn triðingurin av hesi veiðu stavar frá havbiti. Hitt er villur laksur, ið veiddur verður.

Í Alaska verður meiri smolt framleitt enn nakra aðrar staðir. Alt verður slept út á havbit. Tí aling av laksi (mattiski) er bannað í Alaska. Heilar 1,3 milliardir av smolti vóru sleptar út har í 1991.

Í hesum uppskotinum eru møguleikar at skapa nøkur nýggj arbeiðspláss, ið kunnu økja um útflutningsvirðið, og er hetta eisini endamálið við uppskotinum.

1. viðgerð 27. apríl 1995. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnu-flokki tann 20. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 27. apríl 1995 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Karl Robert Johansen, Álvur Zachariasen, John Petersen og Heini O. Heinesen) vísir á, at Fiskirannsóknarstovan upplýsir, at av tí laksasmolti, sum slept er út á havbit í Føroyum, kemur umleið 3% aftur. Royndir hava verið gjørdar við trimum laksastammum, einari norskari, einari føroyskari og einari føroysk/íslendskari. Av tí norsku stammuni koma 3% aftur, av tí føroysku eitt sindur

meira, men fiskurin í tí føroysku stammuni er nakað minni enn í tí norsku. Taltilfarið frá royndunum við tí føroysk/íslendsku stammuni eru ikki liðugt arbeitt enn. Annars verður upplýst, at tað er ójavnt, hvat kemur aftur, t.d. kom bert umleið 1% aftur av smoltinum, sum varð slept úr í Fámjin í 1988. Fiskirannsóknarstovan og landsstýrið hava heimild til at skipa fyri royndarveiði, eisini við gørnum eftir laksi á firðum og sundum, og setir meirilutin tí einki uppskot fram.

Ein minniluti (Jákup Olsen) mælir løgtinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

2. viðgerð 19. mai 1995. Uppskotini I og II fullu við 5-0 atkvøðum.

118 Útbúgvingarverkið upp til nýggja viðgerð

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Føroya løgting samtykkir:
At áleggja landsstýrinum at gera nýggja útbúgvingarætlan fyri alt útbúgvingarverkið við tí endamáli at fastleggja best bóskandi innihald og bygnað við atliti til framtíðar útbúgvingar, samskipan og rationalisering av verandi útbúgvingum eftir føroyskum fortreytum.

Viðmerkingar:

Í alt ov nógv ár hevur tilvildin rátt tá talan er um útbúgvingarætlanir hjá landsins politisku myndugleikum, og støðan hevur verið sera ógreið tá hevur verið um hægri útbúgvingar og hevur hetta fært við sær at skiftandi landsstýri hava fráboðað týðandi broytingar á skúlaøkinum við skerjingum ella øktari játtan á fíggjarlógaruppskotum, í staðin fyri at koma við serstøkum lógaruppskoti um ætlaðar broytingar.

Henda mannagongd hevur verið ov tilvildarlig, og hevur ikki ment um objektiva orðaskifti um neyðugar broytingar á útbúgvingarøkinum, men tvørtur ímóti skapt sera stóra óvissu.

Hetta er orsøkin til, at Kristiligi Fólkaflokkurin heldur tað verða neyðugt at útbúgvingarætlanin øll sum hon er verður tikin upp til nýggja viðgerð, og at eitt skúlapolitiskt orðaskifti í løgtinginum verður avgerandi hvat skal henda á útbúgvingarøkinum, heldur enn ein tilvildarlig avgerð sum hevur til endamáls at fáa eina serstaka politiska kabal at ganga upp, heldur enn um fíggjarorku og tørv.

Hetta er orsøkin til, at Kristiligi Fólkaflokkurin heldur tað vera neyðugt at skúlaverkið verður endurskoðað og nútímansgjørt innan hesi økir:

1. Fólkaskúlan.

2. Læraraútbúgving.

3. Allar vinnu- og miðnámsútbúgvingar.

4. Skipan fyri sjálvsognarstovnar frískúlar í skúlaverkinum.

5. Gjaldsbýtið í rakstrarkostnað millum land og kommunur.

6. Umlegging av fíggingini, so játtanin fylgir næminginum ístaðin fyri skúlanum.

7. Útbúgvingarskipanin tryggar vinnulívinum best møguligar umstøður at virka undir.

8. Lógin um skúlafyrisiting verður endurskoðað og nútímansgjørd.

9. Løgtingslóg um yrkisútbúgvingar verður endurskoðað.

Tað má metast rætt og rímiligt og ein neyðug fortreyt, at ábyrgd og rættindi skulu leggjast út til einstøku lærustovnarnar og skúlarnar, og at tað eru landsmyndugleikarnar sum skulu áseta málini og karmarnar fyri undirvísingina.

Eisini er neyðugt at virksemið hjá Landsskúlafyrisitingini og Læruráðnum verður endurskoðað, og at Landsskúlaráðið verður endurskoðað við møguligari avtøku fyri eyga.

Treytin fyri broytingunum má verða, at yrkis- og aðrar framhaldsútbúgvingar mugu samsvara við tær donsku, soleiðis at ein føroysk útbúgving uttan trupulleikar kann góðkennast at nýtast í Danmmark og sostatt eisini aðrastaðni.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 19. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 18. aprfl 1995.

Við 1. viðgerð tann 24. apríl 1995 varð málið beint í mentannar- og skúlanevndina.

Mentannar- og skúlanevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Adolf Johannessen, Finnbogi Arge, Kristian Magnussen og Signar á Brúnni) vísir á, at útbúgvingarverkið støðugt er til viðgerðar millum skúla- og politiskar myndugleikar.

Meirilutin tekur sostatt ikki undir við uppskotinum og setir tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Óli Breckmann) førir fram, at uttan mun til, hvat løgtingið samtykkir, heldur arbeiðið við at broyta skúlapolitikkin fram í Tinganesi og á Landsskúlafyrisitingini so leingi, henda samgongan situr, mest til ógagns fyri búskapin.

Tí verður hetta uppskotið samtykt, kann hetta gerast frammanundan hart kroystum skattgjaldarum steinur oman á byrði, og tekur Fólkaflokkurin tí ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 24. mai 1995. Uppskotið fall við 7-0 atkvøðum.

119 Virðismetingin av sethúsum framd av fíggjareftirlitinum í 1993, og almenna virðisgrundarlagið á sethúsamarknaðinum í Føroyum í 1993 og í dag

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir:

I.

At áleggja landsstýrinum at leggja fyri løgtingið útrokningarnar hjá Fíggjareftirlitinum av sethúsamarknaðinum í Føroyum í 1993.

II.

At áleggja landsstýrinum at kunngera egnar metingar av sethúsavirðinum, í Føroyum fyri 1993 og 1995.

III.

At áleggja landsstýrium at gera almenn hagtøl sum lýsa ognarviðurskiftini hjá sethúsaeigarunum í Føroyum: sethúsaogn í mun til sethúsaskuld.

IV.

At áleggja landsstýrinum at kanna um grundarlag var hjá Fíggjareftirlitinum at koyra FOSSBANKAN av knóranum:

og hví

FÍGGJAREFTIRLITIÐ ikki kravdi av Føroysku peningastovnunum at sethúsalánini vóru avskrivaði/saneraði, tá prógv var og er fyri, at skuldin í sethúsum eftir metingini hjá Fíggjareftirlitinum gjørdist størri enn virðini á sethúsum, tá teir júst frammanundan kravdi FOSSBANKAN AV KNÓRANUM, av sonu orsøk.

Viðmerkingar:

Sum øllum kunnugt førdu virðismetingarnar hjá danska Fíggjareftirlitinum av sethúsamarknaðinum í 1993 í Føroyum til, at m.a. Fossbankin fór av knóranum, og at stórur partur av sethúsaeigarunum í Føroyum komu í tað brádligu støðu, at lánini gjørdust størri enn ognin. Ongantíð kom fram støðið í útrokningargrundarlagnum hjá Fíggjareftirlitinum, heldur ikki hvørja støðu landsstýrið hevði til metingarnar hjá teimum, ella hvørja støðu almenni lánigrunnurin hjá landsstýrinum Húsalánsgrunnurin hevði til hesa viðmerking.

Allir føroyskir peningastovnar fingu boð um frá Fíggjareftirlitinum í 1993 at niðurskrivað virðið á sethúsum til hesar upphæddir:

- í teimum smæstu bygdunum	kr. 250.000,00
- í miðalstóru bygdunum	kr. 350.000,00
- í býum - vanlig sethús	kr. 500.000,00
- í býum - stór sethús	kr. 700.000,00

Virðismetingarnar hjá Fíggjareftirlitinum førdi til ruðuleika á sethúsamarknaðinum, og tí er tað heilt náttúrligt at Føroya Løgting fær nágreiniligar útrokningar hjá Fíggjareftirlitinum sum lógu til grund fyri niðurskrivingunum, og at støðan í dag verður væl lýst hvat almenna virði á sethúsaognini verður mett til.

Hevði talan verið um vinnufyritøkur har virðini vóru niðurskrivaði á ein tílíkan hátt fóru fyritøkurnar straks av knóranum, ikki bert fyritøkur, men eisini peningastovnar, og tað er FOSSBANKIN, besta dømið um og undir vanligum umstøðum átti ein tílík støða sum hendan at fört við sær, at umleið 65% av øllum sethúsum í Føroyum fóru á húsagang undir einum í 1993.

Spurningurin er tí: hví vóru sethúsini ikki kravd á húsagang, ella hví kravdi Fíggjareftirlitið ikki av føroysku peningastovnunum at sethúsalánini vóru avskrivaði/saneraði, tá prógv var og er fyri at skuldin var og er størri enn virði á sethúsum? tá teir júst frammanundan kravdi FOSSBANKAN AV KNÓRANUM av somu orsøk!

Umstøðurnar førdu við sær, at peningastovnarnir eftir øllum at dømma gjørdu eina ólógliga sínámillum avtalu, sum í fyrstu syftu bjargaðu sær sjálvum uppá turt, meðan sethúsaeigarin var sleptur upp á fjall, uttan møguleikar fyri eini loysn, sum var nøktandi fyri hann og familju hansara.

Ótryggleikin hjá sethúsaeigarunum er í dag so stórur og ørkymlandi, og tí ber ikki til bara at lata standa til, og hert hugsa um at bjarga ávísum peningastovnum burtur úr kreppuni, men neyðugt er eisini við einari varandi skilagóðari loysn fyri sethúsaeigarar, sum hann og familja hansara kunnu góðtaka og liva við.

Niðurskrivingin hjá fíggjareftirlitinum eigur eisini at føra við sær moralskar skyldur hjá peningastovnunum undir einum at avskrivað skuld ájavnt við virði ella 80% av virðinum sum fíggjareftirlitið gav boð um í 1993.

Í øðrum londum finnast hagtøl yvir fíggjarligu støðuna hjá sethúsaeigarum, men í Føroyum eru eingi slík hagtøl, og tí er ikki meira enn rímiligt, at slík hagtøl fáast til vega, og sum kunnu liggja til grund fyri, hvørja loysu almennu politisku myndugleikarnir ynskja at fremja á sethúsaøkinum.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 21. apríl 1995 og varð eftir 1. viðgerð 4. mai 1995 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutu og ein minniluta.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariassen, Kristian Magnussen og Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið er 4 sjálvstøðug uppskot til samtyktar, sum øll áleggja landsstýrinum at upplýsa um ymisk viðurskifti, sum hava við trupulleikarnar hjá sethúsacigarunum at gera.

Tað kundi verið sera áhugavert at fingið hesar upplýsingar, men so einfalt sum at samtykkja fyriliggjandi uppskot er tað ikki.

Viðvíkjandi uppskoti nr. 1. Hesum er landsstýrið neyvan ført fyri at svara, tí landsstýrið hevur ongar møguleikar at fáa tær umbidnu útrokningarnar hjá Fíggjareftirlitinum, tá slíkar upplýsingar koma undir tagnarskyldu, og kunnu tí ikki latast víðari.

Viðvíkjandi uppskoti nr. 2. Landsstýrið hevur ongar metingar av sethúsavirðinum í Føroyum, hvørki fyri 1993 ella 1995. Um uppskotsstillarin meinar við metingarvirðið hjá Fíggjareftirlitinum, so er sama tagnarskylda galdandi, sum víst er á omanfyri.

Viðvíkjandi uppskoti nr. 3. Stórt fyrireikingararbeiði skal fremjast, tá hvør einstøk ogn í Føroyum skal hava ein almenna virðismetan. Hetta hevur verið havt á lofti í onkrari frágreiðing um húskaparligu støðuna í Føroyum, við tí fyri eyga, at fáa álagt ognarskatt í Føroyum. Tað er neyvan ætlanin hjá uppskotsstillaranum við hesum uppskotinum at fyrireika ognarskatt ?

Viðvíkjandi uppskoti nr. 4. Her er aftur galdandi, at peningamál er ríkismál burturav, og tí hevur Føroya landsstýri onga heimild at kanna metingargrundarlag og avgerðir hjá Fíggjareftirlitinum.

Samanumtikið kann sigast, at adressan á uppskotinum er skeiv, hon skuldi heldur verið danska stjórnin, ella møguliga verið ein fyrispurningur til ríkisumboðsmannin.

Út frá hesum kann meirilutin ikki mæla Føroya løgtingi til at samtykkja fyriliggjandi uppskot, fyrr enn vit hava fingið føroyskt lóggávu- og umsitingarvald á hesum øki.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 24. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Við atkvøðugreiðsluna 26. mai 1995 fall uppskotið við 6-0 atkvøðum.

120 Samráðingar við donsku stjórnina um útbygging av flogvøllinum í Vágum: Arbeiðsskapandi tiltøk

Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting samtykkir:

At áleggja landsstýrinum at kanna møguleikan og taka upp samráðingar við donsku stjórnina um útbygging av flogvøllinum í Vágum við frágreiðingini frá Statens Luftfartsvæsen SLV frá 8. januar 1988 sum grundarlag.

Viðmerkingar:
Flogvøllurin í Vágum bleiv bygdur undir seinra heimsbardaga av eingilskmonnum sum ein hernaðarligur flogvøllur, og í 1963 yvirtók Statens Luftfartsvæsen SLV uppgávuna og gjørdi hann í stand, soleiðis, at hann kundi brúkast til royndarflúgving við ferðafólki til og frá Føroyum um summarið. Síðani tá er ferðafólkatalið nógv økt, og í mun til hendan vøkstur eru útbyggingar farnar fram av flogvøllinum gjøgnum øll seksti, sjeyti og áttatiárini, **og hava danir goldið fyri arbeiðið.**

Í 1979 bleiv flogvøllurin longdur til 11,250 m og trygdarøkið víðkað við 150 m.

Orsakað av orðaskiftinum um nýggjan flogvøll, bað Samferðslunevnd Føroya løgtings í brævi tann 22. desember 1987 upplýsingar um ávísar spurningar viðv. flogvallarviðurskiftunum á Glyvursnesi og í Vágum.

Tann 6. januar 1988 letur Statens Luftfartsvæsen frágreiðig um møguleikar fyri útbygging av flogvøllinum í Vágum. Frágreiðingin kostaði uml. 1.000.000,00 kr. men

hava síðani tá einki frætt frá Samferðslunevndini ella Føroya løgtingi um hvørja støðu tey hava til útbyggingarmøguleikarnar av flogvøllinum í Vágum.

Í alt vóru fimm spurningar settir Statens Luftfartsvæsen um útbyggingarmøguleikar av flogvøllinum. Talan var um at leingja vøllin upp til 1.450 m og 1.800 m.

Á síðu 21 í frágreiðingini sigur SLV: "En større banelængde op til 1.800 meter, vil betyde, at det vil være muligt at flyve direkte til en større del av Centraleuropa med maksimal last for de pågældende flytyper". Á sama síðu til spurning 5: "Som vist i afsnit 3, 2, 2, vil en udvidelse til 1.450 m koste ca. 1190 mio. kr. en udvidelse til 1.800 m vil koste ca. 320 mio. kr. jævnfør afsnit 3, 3, 2 og en udvidelse til 1.800 m, men med anvendelse af forskudte tærskler, vil koste ca. 305 mio. kr. jævnfør afsnit 3, 3, 4".

Hóast SLV ikki tekur støðu til útbyggingarspurningin í frágreiðingini, so skilst kortini at skal nakað gerast á hesum øki, so skulu útbyggingarnar fara fram í Vágum, og flogvøllurin leingjast upp til 1.800 metrar.

Ein slík útbygging gevur sum tað eisini sæst á frágreiðingini frá SLV heilt aðrar møguleikar á flogøkinum, og ger okkum føran fyri at røkka onnur endamál enn tey, sum vit í dag røkka við verandi flogvallarmøguleikum.

Tað ber eisini til at lesa frágreiðingina frá SLV á tann hátt, at teir hava einki ímóti at taka spurningin viðv. útbygging av flogvøllinum upp til viðgerðar, men at kjakið í Føroyum hevur forða fyri sakligari viðgerð.

Nú alt arbeiði hjá landsverkfrøðingunum so at siga er steðga upp orsakað av búskaparligu støðuni í Føroyum, er tað ikki meira enn rímiligt, at allir møguleikar verða troyttir til tess at finna møguleikar fyri meiningsfullum útbyggingarætlanum av samfelag okkara, og tí eiga samráðingar at verða tiknar upp við donsku stjórnina um útbygging av flogvøllinum í Vágum við frágreiðingini hjá SLV sum grundarlag.

Skal flogvøllurin leingjast við upp til 1.800 metrar, so skulu brúkast umleið 575.000 kubik av grót til útbyggingina, og spurningurin kann so verða, hvar hetta grót skal koma frá uttan at náttúran verður skemd.

Her eru tríggir møguleikar:
Grótið í sambandi við Gásadalstunnilin,
grótið í grótbrotinum við Flogvøllin,
grótið í sambandi við undirsjóartunnilin.

Hetta merkir ikki at at onnur almenn arbeiðir skulu setast í verk, men er meira ein spurningur um hvar grótið kann takast frá, uttan at hetta gevur stórt árin á náttúruna.

Grótið frá Gásadalstunnlinum kann útgeva eina samlaða nøgd uppá 75.000. kubik, meðan grótið sum kann fáast í sambandi við undirsjóvartunnilin er uppá eini 300.000

kubik, og síðani má støða takast til hvar hini 200.000 kubikkini skulu koma frá. Hugsast kunnu eisini aðrir møguleikar fyri tøku av gróti.

Í vanligum dagsprísi er kostnaðurin pr. kubik av gróti uppá kr. 60,00 og skuldi hetta givið eina inntøku fyri sølu av gróti upp á einar 35 mió. kr.

Fór ein slík útbýgging sum hendan í gongd, kann roknast við at eini 200 fólk fingu arbeiði í eini fýra til fimm ár, umframt maskinamboð, og roknast kann við einir 1000 føroyingar á ein ella annan hátt fingu gagn av útbyggingini.

Hetta er eisini orsøkin til, at uppskotið fyrst og fremst skal skiljast sum eitt arbeiðsskapandi tiltak, **sum danska stjórnin** eisini eigur at hava **moralska skyldu** at viðgera **við vælvild, og gjalda fyri arbeiði, eins og gjørt er øll undanfarin ár.**

Nú tá frágreiðing frá SLV er tøk, og møguleikarnir fyri útbygging av flogvøllinum eru væl lýstir í frágreiðingini, eigur Føroya landsstýri at taka upp samráðingar við donsku stjórnina um framtíðarútbyggingar av flogvallarviðurskiftunum í Føroyum, sum samstundis kann geva fleiri hundrað familjum møguleika fyri meiningsfullum arbeiði.

Loftferðsla er sum kunnugt listað undir B mál punkt 3 í heimastýrislógini, og er ábyrgdarøki hjá donsku loftferðslumyndugleikunum, bæði tá talan er um rakstur og íløgur, umframt ætlanir fyri framtíðina.

Lagt verður við uppskotinum til samtyktar:

a) Statens Luftfartsvæsen:
Udbygningsplan for Vágar Lufthavn 1991 - 1996. (dec. 1990)

b) Statens Luftfartsvæsen:
Vagar Lufthavn Færøerne. Baneforlængelse .
Spørgsmål frá Færøernes Lagting, Trafikudvalget og Torshavns Kommunes lufthavnsudvalg. (6. januar 1988)

1. viðgerð 3. mai 1995. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 3. mai 1995 beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jákup Joensen, Henrik Old, Kristian Magnussen, Álvur Zachariassen og

Heini O. Heinesen) førir fram:

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 23. mai 1995 og fingið upplýsingar og frágreiðing frá Henning Jacobsen, landsverkfrøðingi og Finnboga Niclasen, flogvallaovasta, á sama fundi.

Uppskotið er grundað á frágreiðing frá Statens Luftfartsvæsen dagfest 8. januar 1988 og ætlað sum arbeiðsskapandi tiltak.

Nevndin gevur uppskotsstillaranum rætt í viðmerkingum sínum, at Statens Luftfartsvæsen í frágreiðing síni ikki tekur støðu til sjálvan útbyggingarspurningin, tí hesin verður ikki settur fram beinleiðis.

Eisini kann staðfestast, at Statens Luftfartsvæsen ongar forðingar ávísir fyri útbygging av flogbreytini í Vágum til 1450 metrar ella 1800 metrar, sum er størsti útbyggingarmøguleiki í Vágum, men samferðslunevndin kann ikki taka undir við uppskotsstillaranum í teirri meting, at Statens Luftfartsvæsen í síni frágreiðing kemur til ta niðurstøðu, at skal nøkur útbygging av flogferðslumøguleikunum í Føroyum fara fram, so skulu hesar verða í Vágum við leingjan av flogvøllinum har til 1800 metrar. Hetta sæst ikki tilskilað í frágreiðingini frá Statens Luftfartsvæsen.

Nevndin er heldur ikki samd við uppskotsstillaranum í tí, at danir einsamallir hava goldið allar útreiðslurnar av undanfarnu útbyggingunum, tí tvørtur ímóti kann staðfestast, at partur av samlaðu útbyggingarútreiðslunum eru fallnar í landskassans lut.

Meirilutin kann sostatt ikki taka undir við fyrilyggjandi uppskoti í verandi lki, men setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Álagt verður landsstýrinum við støði í frágreiðingini frá Statens Luftfartsvæsen dagfest 8. januar 1988 at kanna kostnaðin av eini flogbreytarøking í Vágum til 1450 metrar í 1995-prísum, og gera meting um kostnaðarlut landskassans í eini slíkari útbygging.

Minnilutin (Lasse Klein) førir fram:

Landsverkfrøðingurin upplýsti, at stovnurin hevði verið til hjálpar í øllum spurningum, sum snúðu seg um útbygging av flogvøllinum í Vágum. Hann metti, at alt grótið, ið skal brúkast til eina ætlaða útbygging av flogvøllinum kundi takast frá grótbrotinum við flogvøllin uttan, at náttúran varð skemd.

Uppá fyrispurning sigur landsverkfrøðingurin, at danir hava goldið fyri alla útbyggingina av sjálvum flogvøllinum, meðan lendið og vegagerðin er goldin av føroyska heimastýrinum.

Finnbogi Niclasen greiddi frá útbyggingarætlanum og segði, at Statens Luftfartsvæsen kostaði raksturin av flogvøllinum, umframt fløgur.

Hann vísti eisini til frágreiðingina, sum Statens Luftfartsvæsen hevði gjørt eftir umbøn frá Samferðslunevnd Løgtingsins, og undraði seg yvir, at einki svar var komið uppá frágreiðingina og at teir framvegis væntaðu útspæl frá føroyskari síðu.

Uppá fyrispurning helt hann tað vera rætt at útbyggja flogvøllin, og at mannagongdin átti at verða tann, at landsstýrið tók upp samráðingar við donsku stjórnina um hetta mál.

Spurningurin um at leingja flogvøllin upp til 1450 og 1800 metrar varð umtøddur.

Niðurstøðan av orðaskiftinum varð, at fyrimunirnir við at leingja flogvøllin upp til 1800 metrar var ikki so stórur sum upprunaliga mett, og tí heldur nevndin tað vera rætt í fyrstu syftu at kanna møguleikarnar at leingja flogvøllin upp til 1450 metrar og í øðrum lagi nágreinliga at kanna fyrimunir og vansar við at leingja flogvøllin upp til 1800 metrar.

Minnilutin (Lasse Klein og Kjartan I. Joensen) tekur undir við uppskotinum til samtyktar, men ger vart við í viðmerkingunum, at landsstýrið eigur at kanna hvat arbeiðið kann gerast fyri í dag, og hvussu stóran part heimastýrið møguliga skal gjalda, um so er at farið verður undir útbyggingina av flogvøllinum í Vágum.

Í øðrum lagi tekur minnilutin undir við meirilutanum.

2. viðgerð 30. mai 1995. Uppskotið fall við 8-0 atkvøðum. Uppskot meirilutans til samtyktar samtykt við 26-0 atkvøðum.

121 Lækkinng av skattatrýstinum - lands- og kommunuskattinum

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at fremja hesi tiltøk beinanvegin:

1) At skatta- og avgjaldstrýstið til landskassan verður lækkað við 25%.

2) At kommunuskattatrýstið lækkar við 10%, og eingin kommuna fær loyvi at hava hægri kommunuskattaprosent enn 12%.

3) At meirvirðisgjaldið verður avtikið fyri alla framleiðslu- og tænastuvinnu, og somuleiðis meirvirðisgjaldið á neyðsynjarvørum og heilivági.

4) At fólk, sum fáa krígspensjón, ongantíð gjalda meira enn 20% í lands- og kommunuskatti, og at botnfrádrátturin til pensjónistar verður hækkaður, so at allir landsins pensjónistar gerast skattafríir av pensjónsgrundupphæddini.

5) At áleggja landsstýrinum at hava uppskotið klárt 1. august 1995.

Viðmerkingar:

Eitt av teimum heilt stóru vandamálunum í dag er skatta- og avgjaldstrýstið í Føroyum, og verandi skattatrýst hevur sera óhepnar búskaparligar avleiðingar við sær, og tí er alneyðugt at lækka trýstið. Upp undir seinasta val vóru eisini flestu flokkar, sum bjóðaðu seg fram, samdir um, at neyðugt var at steðga afturgongdini í samfelagnum.

Hóast Føroya fólk ynskir broyting í tí førda politikkinum, so hevur verið sera trupult hjá samgonguni at skapt neyðugar fortreytir fyri broytingum yvirhøvur, og gongdin síðani valið hevur víst tørvandi hegni at loysa vandamálini, og er hetta at harmast um.

Tað er fyrst og fremst verandi skattatrýst, sum hevur óhepnar búskaparligar avleiðingar við sær, og tí er alneyðugt at lækka trýstið: **alt Føroya fólk er samt um, at skatta- og avgjaldsstøðið í landinum er alt ov høgt.**

Neyðugt er at fáa lønsemi í hjá tí einstaka, og sum støðan er, fáa heldur ikki tey við

arbeiði og eini rímiligari inntøku, endarnar at røkka saman.

Tí finst eingin møguleiki uttan um spurningin at lækka skatta- og avgjaldstrýstið munandi.

Kristiligi Fólkaflokkurin hevur gjørt fleiri royndir at bøta um hesi viðurskifti, og upp undir valið gjørdi flokkurin heilt greitt, at neyðugt var við einum grundleggjandi broyttum búskapar- og vinnupolitikki fyri at fáa landið aftur á føti: at lækka persónsskattingina og avgjaldsstøðið og at lækka kostnaðarstøðið hjá fólki og vinnuni.

Kristiligi Fólkaflokkurin meinti nakað við sínum ætlaða politikki og helt eisini fast um ætlanirnar, tá ið samgongusamráðingarnar byrjaðu aftan á valið. Hesar samráðingar høvdu sum úrslit eina avtalu, sum, um hon varð framd, heilt skjótt hevði gjørt tað liviligt aftur í Føroyum.

Í dag mugu vit sanna, at tað var stórt spell og ein vanlukka fyri fólk okkara, at hetta ikki bleiv veruleiki, og at aðrir flokkar, sum høvdu fingið veljaras dóm, tóku yvir og halda fram við 90-ára politikkinum, sum Føroya fólk heilt greitt vrakaði við valið 1994.

LÆKKING AV LANDSSKATTINUM.

Við einum nógv lækkaðum landsskattaprosenti verður inntøka landskassans frá persónsskatti væl lægri I. árið, men sum frá líður, hækkar skattainntøkan aftur við óbroyttum skattaprosenti.

Við øktari keypiorku hjá fólki fara brúksgjøldini at geva størri inntøku til landskassan, sjálvt um prosentið verður lækkað.

Eftir upppskotinum fer figgjarlógin at síggja soleiðis út:

Inntøkur	2.050.000
Útreiðslur	1.850.000
Avlop	200.000
-Renta	460.000
Hall	260.000

sum verður at figgja við lánsbrøvum.

Neyðugt er tí at fremja eina **helldarætlan: eina loysn eftir føroyskum fortreytum,** har øll vandamálini verða viðgjørd undir einum, og at fáa hana at virka sum skjótast fyri at fáa gongd á búskapin aftur, og tí mæla vit eisini til, at hesir partar verða tiknir upp til viðgerðar beinanvegin:

a) Fíggjarlógin.
b) Viðurskiftini millum landskassan og ríkiskassan.
c) Vinnulívsbroytingar.
d) Setbúsaviðurskiftir.
e) Kostnaðarstøðið saman við:
skatta- og avgjaldsstøðinum.

Um uppskotið til samtyktar verður samtykt, verður nágreinilig útgreining gjørd av fíggjarlógarpostunum.

LÆKKING AV KOMMUNUSKATTAPROSENTINUM.

Støðan hjá kommununum er framvegis óbroytt, ongin avtala er fingið við lángevarar. Hetta ber í sær, at kommununar framvegis hava ov høgt kommunuskattaprosent. Tí má landsstýrið skunda undir, soleiðis at ein avtala kann fáast sum skjótast. Harmæst er neyðugt at fáa framt nýtt býti millum land og kommunur soleiðis, at kommununar framyvir koma at hava eitt skattaprosent, sum í hægsta lagi er 12%.

Kommunuskatturin er ein av høvuðstrupulleikunum í persónsskattinum hjá fólki, og er hann alt ov høgur og eigur tí att lækka munandi. Orsøkin er fyrst og fremt kommunuskuldin, sum er alt ov stór, og tí er neyðugt at staðfesta, at tað er ein almenn landsstýrisuppgáva at bjarga og hjálpa kommununum burtur úr trupulleikanum.

Raksur, fløgur og avdráttir skulu liggja innanfyri 12%, og alt tað, sum liggur millum 12% og 23%, sum støðan er í dag, skal viðgerast á serligan hátt, og annaðhvørt afturgjaldast eftir serligari skipan ella avskrivast.

LÆKKING- OG AVTØKA AV MEIRVIRÐISGJALDINUM.

Mælt verður til, at meirvirðisgjaldið, sum í vertleikanum hevur darvað, og í allar flestu førum forkomið allari framleiðsluvinnu og tænastuvinnu, skal takast av. Økta virksemið í samfelagnum skal líggja broytingarnar.

Tað eru harnaríku familjurnar, sum líða mest undir meirvirðisgjaldinum og koma sum er at gjalda mest. Tí er tað ikki meira enn rímligt, at heilivágur og neyðsynjarvørur verða frítiknar fyri MVG.

LÆKKING AV SKATTINUM Á KRÍGSPENSJÓN-
SKATTAFRÍA PENSJÓNSGRUNDUPPHÆDD FYRI ALLAR PENSJÓNISTAR.

Í fleiri av okkara grannalondum verður krígspensjónin skattað sera lagaliga, meðan hon í Føroyum verður skattað rættiliga hart, og tí verður mælt til, at pensjónistar, sum fáa krígspensjón, ikki gjalda meira enn 20% í skatti av pensjónini, og at allir pensjónistar gerast skattafrír av pensjónsgrundupphæddini um alt landið.

Síðani skattatrýstið øktist og ES sáttmálin bleiv samtyktur 1. januar 1992, eru

hesar hendingar farnar fram:

1) Arbeiðsloysið er vaksið við miklari ferð, og er tað í løtuni 3.900 av einari samlaðari arbeiðsstyrki upp á 20.300 fólk pr. 31.12.94. til 20% av samlaðu arbeiðsstyrkini í landinum eru arbeiðsleys.

2) Lønarútgjaldingarnar eru lækkaðar úr 4.137,8 mió.kr. í 1991 niður í 3.124,3 mió.kr. 31.12.94, t.e.
minkaðar við 1.012.5 mió.kr.

3) Fólkatalið er minkað úr 47.294 fólkum niður í 43.678. ella ein nettoflyting úr Føroyum upp á 3.616 fólk,
ella heili 10% av samlaða fólkatalinum.

4) Innlánini í føroysku peningastovnunum er lækkað við 3.000 mió.kr.

5) Einar 1.000 fyritøkur, tænastu- og framleiðsluvirki eru hildin uppat ella farin av knóranum.

6) Einí 400-500 sethús eru farin um tvingsilssølur, onnur uml. 800 sethús hava fingið órealistiskar avtalur við peningastovnar um gjald, og kann tí roknast við, at enn fleiri sethús fara av knóranum.

7) Í sama tíðarskeiði er útflutningsvirðið lækkað úr 3.906 mió.kr. niður í 3.207 mió.kr. ella við 700 mió.kr.

Neyðugt er tí, at vit øll gera okkum púra greitt, at koma ongar munagóðar broytingar í skattatrýstinum, so kollsiglir føroyska samfelagið. Tí skal uppskotið á ongan hátt skiljast sum ein politisk yvirbjóðing, men ein staðfesting av tiltøkum, sum eru neyðug at fremja beinanvegin, og tað er ikki minst gongdin í samfelagnum besta prógvið um.

Neyvan nakað annað samfelag í heiminum hevur verið úti fyri slíkari afturgongd, sum tað føroyska, og spurningurin er tí: um Føroya løgting hevur dirvi til at síggja veruleikan í eyguni og vil fremja tær broytingar í skatta- og avgjaldstrýstinum, sum eru neyðugar, og laga inntøkugrundarlagið hjá tí almenna eftir førleikanum hjá fólki og vinnuni.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 2. mai 1995 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Karl Robert Johansen, Vilhelm Johannesen og Finnbogi Ísakson) tekur ikki undir við málinum.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) tekur undir við málinum.

2. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið fall við 8-0 atkvøðum.

122 Upppsøgn av ES sáttmálanum grundað á § 1, stk. a og b

Ár 1995, fríggjadagin 21. apríl legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir:

I

At áleggja landsstýrinum at siga sáttmálan upp, sambært § 36; grundað á § 1, stk. a og b, og krevja nýggjar samráðingar, sum geva føroyska samfelagnum størri fyrimun í samhandlinum við ES, og at miðað verður í móti fullkomnari fríhandilsavtalu, uttan at limaskapur yvirhøvur kemur upp á tal.

II

At heimila landsstýrinum at krevja endurgjald frá ES vísandi til stóru fyrimunirnar, ES hevur havt av avtaluni í mun til føroyska samfelagið, vísandi til § 1 í sáttmálanum, sum er undirskrivaður av báðum pørtum.

Viðmerkingar:

Tann 1. januar 1992 fekk sáttmálin millum Europeiska Búskaparliga Felagsskapin øðru megin og ríkisstjórn Danmarkar og Føroya landsstýri hinumegin gildi.

Áðrenn hesin sáttmálin kom í gildi, vóru viðurskiftini millum Føroyar og ES regulerað á tveimum økjum, nevniliga við avtaluni nr. 2051 frá 1. august 1974 um tollviðurskiftir í ES av føroyskum upprunavørum, og við rammuavtaluni millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri øðrumegin, og á hinari síðuni ES um sínámillum fiskiskap frá 15. mars 1977.

Nýggja avtalan setti stór krøv til báðar partar:

"§ 1.

Sáttmálin hevur til endamáls:

(a) hóvliga at menna búskaparliga sambandið millum Europeiska Búskaparliga Felagsskapin og Føroyar við at økja um sínámillum samhandilin solciðis, at búskaparliga virksemið í Felagsskapinum og í Føroyum verður økt, livi- og arbeiðsorkan betrað, framleiðslan økt og fíggjarliga støðufestið styrkt.

(b) at tryggja samhandlinum sáttmálapartanna millum rímligar kappingarumstøður."

Hendingar síðani sáttmálin við ES bleiv samtyktur av Føroya løgtingi og seinni hátíðarliga undirskrivaður av Føroya landsstýri, og sum fekk gildi 1. januar 1992:

(1) Arbeiðsloysið er vaksið við miklari ferð og er í løtuni 3.900 av einari samlaðari arbeisstyrki upp á 20.300 fólk pr. 31.12.94, ella 20% av samlaðu arbeiðsstyrkini í landinum arbeiðsleys.

(2) Lønarútgjaldingarnar eru lækkaðar úr 4.137,8 mió.kr. í 1991 niður í 3.125,3 mió.kr. 31.12.94, ella minkaðar við 1.012,5 mió.kr. í hesum tíðarskeiði.

(3) Fólkatalið er minkað úr 47.294 fólkum niður í 43.678, ella ein nettoflyting úr Føroyum upp á 3.616 fólk í sama tíðarskeiði, ella heili 10% av samlaða fólkatalinum.

(4) Innlánini í føroysku peningastovnunum er lækkað við 3.000 mió.kr.

(5) Einar 1.000 fyritøkur, tænastu- og framleiðsluvinnur eru hildnar uppat ella farnar av knóranum.

(6) Eini 400-500 sethús eru farin um tvingsilssølu, onnur umleið 800 sethús hava fingið órealistiskar avtalur við peningastovnar um gjald, og roknast

kann við, at fleiri sethús fara av knóranum.

(7) Í sama tíðarskeiði er útflutningsvirðið lækkað úr 3.906 mió.kr. niður í 3.207 mió.kr. ella við 700 mió.kr.

Einki land í ES hevur verið úti fyri slíkari afturgongd sum okkara, og trupult verður at finna ounur samfeløg at samanbera støðuna við.

Hóast endamálsgreinin millum ES og Føroyar er greið tala, so er samhandilin úr Føroyum ikki øktur, búskaparliga virksemið ikki økt, livi- og arbeiðskorini ikki betrað, framleiðslan ikki økt og fíggjarliga støðufestið ikki styrkt. Heldur ikki hevur eydnast at tryggja samhandlinum í hesum tíðarskeiði rímiligar kappingarumstøður mótvegis ES hóast royndir.

Fortreytirnar í sáttmálanum við ES hava ikki hildið, og ásannast má tí, at sáttmálin við ES beinleiðis er ein av orsøkunum til vánaliga úrslitið, og fortreytirnar so nógv broyttar, at til ber ikki at halda fram á sama støði.

Framgongdin í ES í sama tíðarskeiði hevur verið sjónlig á mongum økjum, og tí má sáttmálin metast í botn og grund at vera kappingaravlagandi til stórt ógagns fyri føroyska samfelagið, meðan ES hevur havt framgongd og týðuligar fyrimunir í samhandlinum.

1. viðgerð 27. apríl 1995. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 21. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 3. mei 1995 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

Meirilutin (Helena Dam á Neystabø, Jógvan Adolf Johannessen, Kristian Magnussen, Jákup Lamhauge og Bjarni Djurholm) er samdur við uppskotsstillaran, at handilssáttmálin millum Føroyar og ES ikki er nøktandi. Men meirilutin metir ikki, at tað er rætta mannagongdin bara at siga verandi avtalu upp.

Meirilutin setir einki upppskot fram, men vísir til álitið í tingmáli nr. 15/1994.

Minnilutin (Jógvan Durhuus) tekur ikki undir við málinum, men vísir til viðmerkingar tjóðveldisfloksins og uppskot til samtyktar frá tjóðveldisflokkinum í tingmáli nr. 15/1994.

Minnilutin (Jenis av Rana) tekur ikki undir við málinum, tó at nógv av tí, ið fört verður fram, er so syrgiliga satt. Rætt er, at sáttmálin við ES gjørdist ein kleppur fyri

føroyska samfelagið, at hesin í staðin fyri at verða ein menning gjørdist ein forðing, og at Føroyar í tíðarskeiðnum, sáttmálin við ES hevur verið í gildi, hevur verið úti fyri met afturgongd. Men ivasama æran av øllum hesum tilkemur fyrst og fremst met vánaligu politikkarum okkara og sokallaðu stýring teirra av samfelagnum seinastu 15 árini! Skulu vit sum tjóð fóta okkum aftur, er fyrsta treytin, at vit taka í egnan barm og viðurkenna egnar skeivleikar. At geva øðrum skuldina og enn tá krevja endurgjald frá teimum fyri egið dugnaloysi er størsta mistak, hugsast kann, og meginforðing fyri at koma á røttu kós aftur.

Annars minnir minnilutin á, at umboð Miðfloksins tíverri úrslitaleyst talaði fyri at senda avtaluna við ES til fólkaatkvøðu - út til metan og dóm fólksins.

Loksins loyvir minnilutin sær at vísa til viðmerkingar sínar í øðrum ES máli, sum nýliga var til viðgerðar á løgtingi, løgtingsmál nr. 15/1994.

2. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið fall við 1-0 atkvøðu.

123 Broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4 verður strikað.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om Færøernes Postvæsen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 17 af 31. marts 1976 om Færøernes Postvæsen foretages følgende ændringer:

1) § 4 udgår.

2) Í § 17 verða orðini "í samráð við fíggjarnevndina" strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

2) I § 17 udgår ordene "i samråd med finansudvalget".

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Skotið verður upp at strika standandi heimildina hjá Postverkinum at taka upp lán eftir § 4. Postverkið má fylgja tí vanligu mannagongdini og útvega heimildarlóg fyri hvørja einastaka lántøku, jvb. § 42 í stýrisskipanarlógini.

Skotið verður eisini upp, at landsstýrið einsamalt kann áseta postgjøldini eftir § 17, stk. 1. Víst verður í hesum sambandi til løgtingssamtykt frá 28. juni 1994, sum áleggur landsstýrinum at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá Løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið.

1. viðgerð 21. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram felag ískoytisálit.

Sí ískoytisálit í tingmáli 103/1994.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 86 frá 13. juni 1995.

124 Broyting í løgtingslóg um natúrfriðing

Ár 1995, hósdagin 20. apríl 1995 legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um natúrfriðing.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um natúrfriðing verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 10 verða orðini "sum løgtingið velur" broytt til: "sum landsstýrið velur" og orðini "velur løgtingið 4 tiltakslimir" verða broytt til: "velur landsstýrið 4 tiltakslimir".
2) Í § 11 verða orðini "sum løgtingið velur" broytt til: "sum landsstýrið velur" og orðini "Løgtingið velur" verða broytt til: "Landsstýrið velur".

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om naturfredning.

§ 1.

I lagtingslov nr. 48 af 9. juli 1970 om naturfredning foretages følgende ændringer:

1) I § 10 ændres ordene "der vælges af lagtinget" til: "der vælges af landsstyret" og ordene "vælger lagtinget 4 suppleanter" ændres til: "vælger landsstyret 4 suppleanter".
2) I § 11 ændres ordene "der vælges af lagtinget" til: "der vælges af landsstyret" og ordene "Lagtinget vælger" ændres til: "Landsstyret vælger".

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Skotið verður upp, at landsstýrið velur teir limir í friðingar- og yvirfriðingarnevnd, sum løgtingið higartil beinleiðis hevur valt.

Víst verður í hesum sambandi til løgtingssamtykt frá 28. juni 1994, sum áleggur landsstýrinum at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Føroya landsstýri tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð tann 24. apríl 1995 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og **ein samd rættarnevnd** mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 18-0 atkvøðum.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

Lóg nr. 64 frá 13. juni 1995.

125 Broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 51 frá 1. juni 1977 um fólka- og farmaflutning verður gjørd henda broyting:

§ 6 verður strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om passager- og godsbefordring.

§ 1.

I lagtingslov nr. 51 af 1. juni 1977 om passager- og godsbefordring foretages følgende ændring:

§ 6 udgår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Sambært § 6 skal løgtingið samtykkja, um rutur verða settar á stovn av tí almenna. Hetta eru mál, sum í stóran mun mugu sigast at koma undir heitið "umsiting", og rættast má tí verða, at landsstýrið einsamalt kann taka avgerðir av hesum slag.

Víst verður í hesum sambandi til løgtingssamtykt frá 28. juni 1994, sum áleggur landsstýrinum at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá Løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið.

1. viðgerð 21. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 24-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram ískoytisálit.

Sí ískoytisálit í tingmáli 103/1994.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 79 frá 13. juni 1995.

126 Broyting í løgtingslóg um áseting av telefongjøldum

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av telefongjøldum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 22. mai 1969 um áseting av telefongjøldum verður gjørd henda broyting:

Í § 1 verða orðini "og fíggjarnevndini" strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fastsættelse af telefontakster.

§ 1.

I lagtingslov nr. 28 af 22. maj 1969 om fastsættelse af telefontakster foretages følgende ændring:

I § 1 udgår ordene "og finansudvalget".

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Skotið verður upp, at landsstýrið einsamalt kann áseta telefongjøldini eftir § 1.

Vísst verður í hesum sambandi til løgtingssamtykt frá 28. juni 1994, sum áleggur landsstýrinum at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið.

1. viðgerð 21. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 25-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram ískoytisálit.

Sí ískoytisálit í tingmáli 103/1994.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 89 frá 13. juni 1995.

127 Fyribyrgjan av verkfalls/verkbanns avleiðingum

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, vegna miðflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til, at tænastur/veitingar til gomul og sjúk ikki verða fevnd av verkfalli/verkbanni.

Viðmerkingar:

Á vári 1993 vórðu flestu sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum eftir avtalu við fakfeløgini longdir til 1. januar 1994. Samstundis varð gjørd ískoytissemja um lønarniðurskurð v.m. Hetta merkti, at sáttmálaloysi fór at verða 1. januar 1994, bæði viðvíkjandi sjálvum sáttmálunum og ískoytissáttmálunum.

Til tess at fyribyrgja hesum, vildi landsstýrið lóggeva og kom hin 20. oktober 1993 í tingið við uppskoti um løgtingslóg um leinging av ávísum lønarsáttmálum og avtalum. Sama dag legði so landsstýrið eisini fyri tingið uppskot til løgtingslóg um avmarking av hækkingum í lønum v.m.

Tað fyrra uppskotið tók landsstýrið aftur, meðan tað seinra, sum eisini varð viðgjørt í arbeiðaramálanevndini varð samtykt.

Meirilutin í arbeiðaramálanevndini (umboðini hjá javnaðar- tjóðveldis- og sjálvstýrisflokkinum) førdu m.a. fram: "Ásannandi fíggjarstøðuna, ið ger, at eingir møguleikar eru at hækka lønir í løtuni, tekur meirilutin undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað".

Lógin skuldi galda tíðarskeiðið 20. okt. 1993 - 1.mars 1995.

Ósemja á almenna arbeiðsmarknaðinum tók seg so upp í mars mánaða í ár og vit fingu eitt nærum 3 vikurs langt verkfall, sum endaði við semju partanna millum.

Verkfall/verkbann er eitt vápn sum helst allir partar hava góðtikið sum "nýtilegt" amboð, tá samráðingarroyndir í fyrstu syftu ikki røkka.

Verkfallið hesaferð - sum oftast - harðnaði sum tíðin leið. Serliga var tað almenni flutningurin oyggjanna millum, sum merkti gerandisdagin - og almennu

monopolmiðlarnir sum nærum tagdu. Tey flestu fakfeløgini kendu sær hógv í so máta.

Tó vóru tað ávís fakfeløg, sum nýttu "ódámlig vápn" og tóku ósek sum gíslar í hesum stríði.

Her verður serliga hugsað um hugburðin og atgerðina hjá Føroya Pedagogfelag, sum m.a. førdi við sær, at menningartarnað búgvandi heima og brúkarar av umlættingarstovnum kendu sviðan av hesum atgerðum.

Onnur avleiðing av verkfallinum var, at Vaktar- og bjargingartænastan lá paralyserað (lammað) við bryggju.

Onnur óheppin dømi í sambandi við verkfallið kundu óivað verið nevnd - t.d. at landsstýrið lýsti verkbann móti ávísari deild á landssjúkrahúsinum.

Hóast verkfall, so er tað umráðandi, at politiski myndugleikin er so inikið at sær komin, at ekstremistar ikki fáa loyvi til gíslatøkur sum raka sjúk, gomul og menningartarnað - ella sum hótta neyðugar tænastur, tað verði seg á sjógvi ella landi. Tað sama er galdandi fyri møgulig verkbann.

Tí er at vóna, at landsstýrið við t.d. at broyta setanarviðurskifti ella á annan hátt - um neyðugt við lóg - tryggjar, at almennar tænastur/veitingar til gomul, sjúk og menningartarnað ikki verða merktar av møguligum verkfalli/verkbanni framyvir.

Ein høvuðsavtala millum partarnar á almenna arbeiðsmarknaðinum hevði uttan iva verið gagnlig í so máta - og eigur tí at verða skundað undir, at ein slík gerst veruleiki.

1. viðgerð 3. mai 1995. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er framlagt av miðflokkinum tann 20. apríl 1995. Við 1. viðgerð 3. mai 1995 varð málið beint í arbeiðaramálanevndina.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin í nevndini (Atli Hansen, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskoti miðfloksins og setir tí einki uppskot fram. Meirilutin heldur, at hesi viðurskifti eiga at verða greidd av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Minnilutin (Jenis av Rana) tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 22. mai 1995. Uppskotið fall við 4-0 atkvøðum.

128 Nýggj fólkatrygging

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um avlamis-, lívs- og eftirlønartrygging, frádrigin skattinum.

§ 1. Allir føroyingar í vinnu hava skyldu at vera undir avlamis-, lívs- og eftirlønartrygging.

§ 2. Avvarðandi hjá tryggjaðum koma somuleiðis undir trygging.

§ 3. Limir í yrkisfeløgum kunnu tekna samfelagstrygging, einstaklingar sína egnu trygging og í báðum førum ta trygging, ið tryggingartakarar í felag/einsæris halda hóska best til tørvin.

§ 4. Yrkisfeløg hava skyldu mótvegis limunum, at tey eru tryggjað.

§ 5. Allar tryggingar skulu umfata:
a) Útgjalding við deyð áðrenn fylta 67 ár, (60 ár), antin undir einum ella leypandi útgjalding árliga/mánaðarliga ella samansetting av báðum,
b) Útgjalding við avlamni, (2/3 av lønini ella meir) áðrenn fylta 67 ár (60 ár), antin undir einum ella leypandi, sum tørvurin er,
c) Útgjaldingin millum fylta 60 og 67 ár, (undir einum, leypandi ella bæði).

§ 6. Aðrar tryggingar, sum fólk í felag ella einsæris hava teknað, verða ikki ávirkaðar av hesi lóg og hava framvegis gildi.

lagtingslov om invalide-, livs- og pensionsforsikring, fradraget i skatten.

§ 1. Alle færinger i erhvervsarbejde er forpligtet til at tegne invaliditetsforsikring.

§ 2. Den forsikredes pårørende omfattes af forsikringen.

§ 3. Medlemmer i fagforeninger kann tegne gruppeforsikringer, enkeltpersoner deres egen forsikring og i begge tilfælde den forsikring, som de/den sikredes hver for sig skønner, passer bedst til behovet.

§ 4. Fagforeninger er forpligtet til at forsikre deres medlemmer.

§ 5. Alle forsikringer skal omfatte:
a) Udbetalingen ved død før det fyldte 67 år (60 år) enten een samlet udbetaling eller løbende udbetaling årligt/månedligt eller en kombination heraf,
b) Udbetaling ved invaliditet, (2/3 af lønnen eller mere) før det fyldte 67 år (60 år) enten een samlet udbetaling eller løbende efter behov,
c) Udbetalingen mellem det fyldte 60 og 67 år (i een udbetaling løbende eller en kombination heraf).

§ 6. Andre forsikringer, som personer i fællesskab eller individuelt har tegnet, berøres ikke af denne lov og har fortsat gyldighed.

§ 7. Fólka- og avlamispensjónsskipanin verður ikki ávirkað av hesi lóg, heldur ikki útgoldnu upphæddirnar.

§ 8. Tá henda lóg er samtykt, fer løgtingslógin um "Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn" úr gildi.

§ 9. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ 10. Inngoldna tryggingargjaldið verður 1% av bruttolønini í 1996, 2% í 1997, 3% í 1998, 4% í 1998 og 5% í 2000.

Tryggingargjaldið verður flutt um afturhaldsskipanina til tryggingarkonto hins einstaka tryggingartakarans.

Skattligi frádrátturin verður samsvarandi reglunum í galdandi skattalóg.

§ 7. Folke- og pensionsordningen berøres ikke af denne lov, heller ikke udbetalte beløb.

§ 8. Når denne lov er vedtaget, træder lagtingslov om "solidarisk arbejdsmarkedspensionsfond" ud af kraft.

§ 9. Denne lov træder i kraft straks.

§ 10. Forsikringspræmien er i 1996 1% af bruttolønnen, i 1997 2%, 1998 3%, 1999 4% og 5% i år 2000.

Præmien indbetales over skattesystemet til den forsikredes konto i forsikringsselskabet.

Skattemæssigt fradrag følger skattelovens bestemmelser herom.

Viðmerkingar

Í borgarliga samgonguskjalinum, undirskrivað av 18 tingmonnum tann 30. august 1994, (tað var áðrenn sambandið valdi at skipa verandi sosialistisku samgongu) stendur skrivað undir punkt 0.8 "Almannamál" hetta brotið:

"Miðað verður eftir, í tann mun fíggjarligu vánirnar eru til tess, at stovna eina lógbundna eftirlønar-, lívstryggingar-, einkju- og einkjumanna pensjóns- og avlamisskipan fyri allar borgarar, har gjøldini fyri løntakarar verða fíggjað um afturhaldsskipanina sum fastur partur av goldna skattinum (jmbr. lívs- og pensiónstrygging Havnar Arbeiðsmannafelags).

Slík tryggingarskipan hevði stórliga bøtt sosialu trygdina hjá hvørjum einstøkum løntakara, hevði økt almikið um samansparingina, og hevði í longdini avlastað útreiðslurnar til almannaverkið.

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin verður tikin av."

Hetta lógaruppskot fólkafloksins til Løgtingið er í tráð við omanfyri endurgivna setning í borgarliga samgonguskjalinum og verður fíggjað við 1% av útgoldnu lønini í 1996, 2% í 1997, 3% í 1998, 4% í 1998 og 5% í ár 2000. ístaðin fyri goldnan skatt, inntil árliga skattafría pensiónsgjaldið er nóg høgt, t.d. 9.000 kr. um árið fyri miðal løntakarar, til at bera uppi ætlaðu lívs- avlamis-, einkju-, einkjumanna- og eftirlønartryggingini í hesum uppskoti.

Tann lívs-, avlamis- og eftirlønarskipan, sum skotin er upp her, hevur fleiri fyrimunir fram um verandi skipanir og lógir.

Fólkapensjónin í dag er ov lág, og við verandi vøkstri í talinum á eldri fólki í mun til lutfalsliga minkandi talið á vinnuførum fólki linkar orkan hjá samfelagnum at bera fíggjarligu byrðarnar av fólkapensjónini í framtíðini.

Í 80'árunum vóru 23.000 fólk á arbeiðsmarknaðinum, altso tá nærum 5 fólk í løntum arbeiði, sum kundu gjalda um skattin til hvønn pensjónist. Frátlytingin úr føroyum og arbeiðsloysið hava gjørt, at nú eru bert uml. 17.-18.000 fólk í arbeiði. Altso eru bert 3 fólk at bera útreiðslurnar til hvønn pensjónist.

Tí má aldurdómurin hjá fólki tryggjast í størri mun enn higartil. Hetta lógaruppskot ger Føroyar til eitt betri samfelag at eldast í.

Somuleiðis er almenna avlamispensjónin hvørki til at liva ella doyggja av, og hetta uppskot evnar at tryggja avlamnum betri inntøku.

Vanlukkutryggingin røkkur hvørki til lítið ella stórt, og tí er rett at lógartryggja rættin hjá fólki, ið doyggja av vanlukku ella koma sær til skaða, og avvarðandi teirra at eiga eina trygd, sum hetta lógaruppskot eisini veitir.

<u>Arbeiðsmarknaðargrunnurin</u>:
Henda uppskotna samtrygging hevur fleiri fyrimunir við sær: Í fyrsta lagi ávirkar hon ikki og er óávirkað av verandi pensjónsskipanum, undantikið "Arbeiðsmarknaðarskipanin", sum fellur burtur, um hetta uppskot verður samtykt. Men um Arbeiðsmarknaðargrunnin er at siga, at tær fáu hundrað miljónirnar, sum eru savnaðar í hann farnu 4 árini, høvdu ikki munað til meir enn 2 mánaðir av verandi pensjónsgjøldum. Landsstýrismaðurin í almannamálum helt ikki sítt lyfti í aprfl 1991, at inngjaldið í grunnin skuldi fáa fyrimun av tryggingarrentu. Tað varð flutt í bankan, og nevndin er bert samankallað hendinga ferð. Hon veit einki um rentutilskrivingina. Nú hevur ALS lænt grunnsfæið fyri 5% rentu. Kanska líka frægt, tí partur av fænum hevði helst verið mistur, tá bankarnir fóru av knarvanum, tí tað kemur ikki undir innlánstrygdargrunnin ("indskydergarantifonden"). Arbeiðsmarknaðargrunnurin fer kanska í søguna, og hann ger hvørki til ella frá, nú ella seinri.

Men við eini arbeiðsmarknaðartrygging sum hesi uppskotnu eru pengarnir hjá tryggingartakarunum vardir við strongum reglum, hvussu teir kunnu lænast út, og av Tryggingaravtalulógini.

<u>Fyrimunir við hesum uppskoti</u>:
Henda uppskotna fólkatrygging ber í sær persónligt frælsi til at laga útgjaldið til veruliga tørvin hjá hvørjum einstøkum borgara/tryggingartakara og húski hansara/hennara. Uppskotið hevur hesar fyrimunir fram um verandi Arbeiðsmarknaðargrunn.

1. <u>Lógin er ein lívstrygging við stórari útgjalding við deyð í ótíð, t.e. áðrenn fylta 67 ár</u>.

Tryggingin kann antin verða útgoldin undir einum og vera minst einar 2-3 árslønir, ella ið hvussu er nóg stór til at niðurgjalda øll persónlig lán. Møguligt er eisini at velja eina árliga útgjalding lívsvarandi ella í minsta lagi 10 ár, ella samanseting av báðum møguleikum.

Tryggjaði ásetir sjálv/ur hesa upphædd eina ferð um árið.

Tørvurin á slíkari útgjalding er stórur, tí í løtuni eru um 540 einkjur og 125 einkjumenn, ella 665 ialt, og av hesum fáa einans 40 einkjur einkjupensjón frá tí almennu einkjupensjónsskipanini. Broytingarnar í tølunum ymsu árini vísa týðiliga, at einkjurnar noyðast út á arbeiðsmarknaðin at royna at klára seg sum frægast. Nú eru møguleikarnir fyri at fáa arbeiði hjá so ábærum bólki sum einkjum nógv versnaðir.

2. <u>Henda lógin er avlamistrygging við stórari útgjalding við avlamni.</u>

Henda útgjalding eigur at vera 80% av ársinntøkuni og fellur til útgjaldingar frá Føroya Lívstrygging, tá tryggjaði gerst 2/3 óarbeiðsførur ella 2/3 avlamin ella meira.

Hetta er nógv betri skipan enn verandi almenna forsorgarhjálpin. Til sammetingar treytar forsorgarhjálpin, at tann avlamni eigur ikki tøkan pening, og forsorgarhjálpin verður eisini ávirkað av inntøku hjá hjúnafelaganum. Henda uppskotna lógin veitir somu útgjalding uttan mun til uppsparing og hjúnainntøku tryggingartakarans.

Um tørvin kann annars vísast á, at Almannastovan í løtuni rindar miðal og hægstu avlamispensjón til fleiri enn 1.600 avlamispensjónistar, og fáa hesi í miðal bert millum 53-76.000 kr. árliga, beinleiðis av fíggjarlógini. Hetta eru smá tøl sammett við vanligar ársinntøkur, hóast ein lítil partur av almennu avlamispensjónunum er skattafrír.

Til sammetingar tryggjar hetta lógaruppskot tann veruliga tørvin hjá fólkinum við 80% av inntøkuni. Sundurgreinað á nakrar inntøkubólkar tryggjar uppskotið avlamisútgjøld sum niðanfyri víst:

Ársinntøka	kr. 100.000 á 80%	= kr. 80.000
-	kr. 140.000 á 80%	= kr. 112.000
-	kr. 160.000 á 80%	= kr. 128.000
-	kr. 200.000 á 80%	= kr. 150.000
-	kr. 250.000 á 80%	= kr. 200.000

Við slíkum veitingum eftir hesum tryggingaruppskoti kemur landskassin sum frá líður at spara pening til avlamisveitingar, og fólk fáa ta avlamisveiting, tey í verulcikanum hava fyri neyðini, samstundis sum henda inntøkan er skattskyldug inntøka hjá móttakaranum, sum landskassan fær skatt burturav.

Frestandi 20% hava tey flestu rætt til at fáa sum avlamisveiting frá Almannastovuni, tó ikki fyrrenn endaligt avlamni er staðfest. (Fyri persónar við inntøku undir 100.000 kr. er rættast at skjóta upp 20% av inntøkuni.)

3. Í báðum førum kann tryggingartakarin laga omanfyri nevndu útgjaldingar eftir persónligum tørvi hins einstaka ella yrkisfelaga (um talan er um samlagstrygging) og eisini fáa bæði at passa saman við persónligu eftirlønartryggingina hjá sær, sum eisini er umfatað av hesum uppskoti.

4. Henda lógin ber í sær, at tryggingargjaldið verður drigið frá goldna skattinum og lættir sostatt skattatrýstið á allar inntøkur við somu upphædd (upp til 9.000 kr.). Uppskotna skipanin lættir lutfalsliga mest um hjá lægru inntøkubólkunum. Harafturímóti herðir gjaldið til Arbeiðsmarknaðargrunnin skattatrýstið bæði hjá løntakara og arbeiðsgevara.

5. Henda lógin virkar frá byrjan skjótari og munabetur enn Arbeiðsmarknaðarskipanin, (sum eingin nytta hevur verið í higartil og verður tað neyvan fyrrenn nakað inn í næstu øld, og tá framvegis uttan rentutilskriving eftir tryggingarskipanini).

6. Henda lógin tryggjar eisini eina útgjalding til fólk í aldrinum millum 60 og 67 ár. Henda útgjalding kann antin vera alt undir einum ella leypandi árlig útgjalding ella sammeting av báðum, alt eftir persónligum tørvi.

(Rentan hjá Føroya Lívstrygging er í løturi 7% (2% hægri enn hægsta bankarenta). Síðstu 12 árini hevur grundarlagsrentan + honusrentan hjá Føroya Lívstrygging verið um 10% í meðal, tó seinastu 2 árini um 9%. Men nú fíggjarognaravgjaldið varð lagt á ein part av fænum, er rentan fyribils broytt til 7%.).

7. Høvuðsvinningurin fyri flestar tryggingartakarar verður sambært hesum lógaruppskoti eftirlønin, t.e. pensjónin til ellisárini eftir fylta 67 ár. Her hevur rentutilskrivingin og áramálið fyri tryggingina størst týdning. Bæði í Føroyum og í grannalondum okkara roynist langtíðarsamansparing til ellisárini nógv betur gjøgnum tryggingarfeløgini og eftirlønarkassarnar enn gjøgnum eina almenna almannaskipan.

Borgarin fær eftir hesum uppskoti hægstu rentu til ellisárini og røttu veitingar við óvæntaðan deyða ella óarbeiðsføri áðrenn.

Borgarin fær sjálvur høvi frammanundan at áseta veitingar á hvørjum ári í mun til egnan tørv og møgulig minstukrøv áselt antin gjøgnum yrkisfelag ella lóggávuvaldið og undir leiðbeining av kønum fólki eftir persónligum ynski.

Heimaarbeiðandi húsmóðirin fær vanliga sína samansparing saman við tryggingini hjá húsbóndanum. Men tørvurin til fíggjarliga hjálp við óarbeiðsføri ella deyð er til staðar, og kann hetta loysast við fskoyti til hansara trygging.

8. Tryggingargjaldið er her árliga sett javnt fyri allar tryggingartakarar, upp til 9.000 kr. Men har yrkisfeløg ella einstaklingar sjálvi hava ásett annað gjald, kann tað hægra gjaldið verða brúkt. Endamálið við at fastleggja eitt gjald sum 9.000 kr., er mest fyri at fáa arbeiðandi fólkið longu í ungum árum regluliga at seta pening av til eftirlønarendamál. Men samansetingina av tryggingini eiga tey sjálvi at vera við til at taka støðu

til.

9. Hetta uppskotið tálmar almennu nýtsluni og fremur eina uppsparing upp til 90 mió. kr. árliga (um vit siga, at henda skipan umfatar 10.000 skattgjaldarar, sum enn ikki hava eftirlønartrygging). Men verandi almenna skipanin við beinleiðis veiting frá skattgjaldara til pensjónist økir almennu nýtsluna og munar ov lítið fyri pensjónistin, tí eingin rentutilskriving er í longdini.

10. Uppskotna skipanin økir uppsparingina í samfelagnum við 90 mió. kr. árliga í rentuvinningin. Sostatt gagnar hon bæði einstaklingum og vinnulívinum, sum fær betri fíggingarmøguleikar til arbeiðsskapandi tiltøk.

11. Mótsett tungu, óliðiligu og munalítlu Arbeiðsmarknaðarskipanini ber hetta lógaruppskotið valfrælsi í sær fyri einstaka tryggingartakaran.

Samanumtikið virkar henda uppskotna samtrygging eisini fyri avvarðandi hjá tryggingartakarum, heimaarbeiðandi húsmóðirini, einkjuni og einkjumannintum, serliga tá óvæntað deyðsfall rakar familjufólk millum 20 og 67 ára aldur. Eini 80-90 fólk í hesum bólki doyggja hvørt einasta ár.

Uml. 7-8.000 einstaklingar í Føroyum (av um 17-18.000 í løntari vinnu) hava longu teknað trygging einsæris ella samlagstrygging gjøgnum yrkisfelag. Fleiri modell eru tøk, og landsstýrið er væl kunnað við ymsar møguleikar frá teim samráðingunt, ið verið hava um eftirlønar-, lívs- og avlamistryggingar við yrkisfeløg, ið hava lønar- og starvssáttmálar við hitt almenna, t.d. Starvsmanna-, Post-, Teknikara-, Maskinmeistara-, Løgfrøðinga-, Magistara-, Lærara-, Sjúkrasystra- o.m.o. yrkisfeløg, sum øll eru fegin um sínar tryggingarskipanir. Havnar Arbeiðsmannafelag hevur fingið frálíka samlagstrygging og var millum slóðbrótandi verkamannafeløgini at fáa slíka trygging.

Men enn er eingin slík trygging fyri fleiri av størstu feløgum í landinum, eitt nú Føroya Arbeiðarafelag og Handverkarafeløgini. Tey bíðaðu og bíðaðu, men vórðu vónsvikin av Arbeiðsmarknaðargrunninum, sum hvørki varð egg ella ungi. Hesir túsundtals løntakarar fáa við hesum uppskoti møguleikan at tryggja sær aldurdómin, umframt lívs- og avlamistrygging, goldin um afturhaldsskipanina.

Munurin á pensjón við "gjald-so-hvørt-veiting" og við trygging:

Tá hitt almenna átekur sær ábyrgdina av allari inntøkutrygd borgaranna í trongstøðu, kennir hin einstaki seg minni eggjaðan til sjálvur at spara pening saman at tryggja seg móti skaða, avlami og aldurdómi.

Tískil hevði henda lógin um sjálvpensjónering elvt til størri samansparing í samfelagnum. Hon hevði givið vinnulívi og tí almenna størri fløgukeldur at læna frá. Serliga væl hevði henda skipan komið við í dag, nú landsstýrið leggur hald á dastið av rentuvinningi, lemjir harvið allan sparihug og trýstir innlán og bankajavnar niður.

Henda tryggingarskipan hevði aftur givið fólki meir sjálvsábyrgd av egnum lívi og aldurdómi. Samstundis hevði meinigi føroyingurin sum tryggingartakari økt sín ognarlut í samfelagsvirðunum. Kapitalurin hevði verið spjaddur á nógv fleiri hendur enn nú. Ein demokratisering av eini nógv øktari peningasamansparing hevði eisini gjørst veruleiki við hesi tryggingarskipan. Vit høvdu sloppið undan verandi støðu, at gjøldini av Føroya fólki er tvingað við verandi "gjald-so-hvørt-skipan" at hóra ígjøgnum lívið til ein óvissan aldurdóm, meðan bert tær stóru inntøkurnar og yrkisfeløg teirra alment løntu nú fáa fyrimunin av rentutilskriving við tryggingaravtalum og kapitalpensjón.

Ein umfatandi heildartrygging fyri alt Føroya fólk uttan fyri ávirkan av landskassa og almannaverki hevði gjørt, at politikarar høvdu havt minni høvi til at pilkað við og broytt pensjónsskipanirnar í heilum. Politisk uppílegging í tíð og ótíð hevur bert gjørt útlitini fyri aldurdómi ótryggari og pensjónsskipanina óstøðugari.

Samfelagsligi munurin á eini "gjald-so-hvørt-skipan" við beinleiðis veiting frá skattgjaldara til pensjónist uttan rentutilskriving og eini langtíðar tryggingarskipan við rentuvinningi, har hvør einstakur ella yrkisbólkur eitt heilt arbeiðslív rindar til sína egnu avlamis-, lív- og eftirlønartrygging, er ovurstórur. Sum <u>sammetandi dømi</u> kann verða nevnt (í dagsprísum):

Ein pensjónistur livir uml. 10 ár í meðal, frá 67-77 ára aldur, og fær uml. 50.000 kr. árliga, ella uml. 500.000 kr. ialt í fólkapensjónsinntøku. Hugsa vit okkum, at viðkomandi sjálvur eftir "gjald-so-hvørt-skipan" uttan rentutilskriving sparir hesa upphædd saman alt sítt virkna lív, frá 20-67 ára aldri, merkir tað eitt mánaðrgald upp á uml. 900 kr. (47 ár x 12 mánaðir x 900 kr. = ca. 500.000 kr.).

Sami pensjónistur, um hann sjálvur spardi saman hesar 500.000 kr. **við rentutilskriving** (eftir hesum lógaruppskoti), so tørvaði honum bert at goldið uml. 250 kr. mánaðarliga í 47 ár til tess at fingið útgoldið 500.000 kr. sum eftirlønargjald. Altso økir rentuvinningurin eftir tryggingarskipanini spariorkuna av einum føstum langtíðar inngjaldi 3-4 ferðir!

Snara vit dømunum eitt sindur á, so hevði eitt fast inngjald upp á 900 kr. mánaðarliga í 47 ár fíggjað tryggingartakara t.d. hesar pensjónsmøguleikar:

1. Útgjald við deyð áðrenn 67 ár:	kr. 300.000

(Við deyða straks eftir tryggingartekning, hóast 300.000 ikki eru inngoldnar + uppspard saldo, eftir at samlaða tryggingargjaldið er farið upp um 300.000 kr.)

2. Avlam. pensjón, 80% av ársløn (árl. frá avlamnisdegi).	kr. 120.000
3. Eftirlønartrygging frá 67 ári (2,2 mió. kr.)	kr. 2.200.000

(Omanfyrinevnda samansetting av pensjónsmøguleikum kann broytast eftir ynski

tryggingartakarans)

Henda pensjónstryggingarskipan er lógarfest, men gevur hvørjum tryggingartakara sær frælsi undir ábyrgd til at avgera samansetingina av egnari pensjón. Hon órógvar ikki verandi skipanir, uttan avtekur hin nyttulcysa Arbeiðsmarknaðargrunnin. Føroya Lívstrygging hevur longu uml. 600 mió. kr. í samansparing og fær uml. 55 mió. kr. árliga í pensjónsgjøldum. (Hendan uppskotna heildartrygging savnar 90 mió. kr. árliga + rentur). Ei heldur kemur uppskotið í staðin fyri verandi fólkapensjónsskipan ta fyrstu tíðina, men verður heldur eitt gott ískoyti, javnber samlagstryggingina hjá IIA. Verandi "Gjald-so-hvørt-skipanin" klárar sína uppgávu eina tíð fram. Men eftir fáum árum verður henda uppskotna heildartryggingin høvuðsáliti.

Føroya Lívstrygging kann umsita eina slíka samtrygging fyri allar 17.000 løntakarar (umsitur í dag 7.000 tryggingar). Tryggingargjaldið er sett til uml. 5% av vanligari ársløn, men drigið frá goldnum skatti nervar tað ikki inntøkuna hjá fólki.

Fyrimunurin við hesi uppskotnu samtryggingini fram um ein naknan og einsttátaðan Arbeiðsmarknaðargrunn og fram um vanliga kapitalpensjón er, at útgoldna tryggingarhæddin altíð verður dagførd við lønarlagið, samstundis sum hon fremur trygga og støðuga prís- og lønargongd í samfelagnum yvir longri áramál.

1. viðgerð 3. mai 1995. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 18. apríl 1995.

Við 1. viðgerð tann 3. mai 1995 varð málið beint í almanna- og heilsunevndina.

Almanna- og heilsunevndin hevur viðgjørt málið, og hevur nevndin býtt sig í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Kristian Magnussen, Maria Hansen og Sverri Midjord) taka ikki undir við uppskotinum, men skjóta upp, at málið verður sent landsstýrinum, soleiðis at landsstýrið í arbeiðinum at gera nýggjar sosialar lógir kann hava uppskoti við í viðgerðini.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Lasse Klein) taka í fyrsta lagi undir við uppskotinum og mæla til at samtykkja tað.

Í øðrum lagi tekur minnilutin undir við meirilutanum.

2. viðgerð 31. mai 1995. Málið fall við 8-0 atkvøðum.

129 Ígildissetan fyri Føroyar av lóg "om erhvervsfremme"

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at lóg "om erhvervsfremme" kann setast í gildi fyri Føroyar sambært hjálagda "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om erhvervsfremme".

Viðmerkingar:

Partar av lógini eru settir í gildi sambært "Anordning nr. 369 af 11. juni 1993 om ikraftræden på Færøerne af lov om erhvervsfremme", sí løgtingsmál nr. 63/1992: Ígildissetan fyri Føroyar av lóg "om erhvervsfremme".

Seinni hevur løgtingið samtykt at heita á ríkismyndugleikarnar um at seta aðrar partar av lógini í gildi, sí løgtingsmál nr. 102/1993.

Í "Fælleserklæring fra møde den 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre", punkt III, undirpunkt "Udstrækning av danske erhvervsfremmeordninger til Færøerne", er ásett, at stig skulu takast til at seta danskar vinnuframa-skipanir í gildi í Føroyum.

Tí er gjørt uppskot um at seta alla donsku "lov om erhvervsfremme" í gildi fyri Føroyar sambært hjáløgdu fyriskipan.

1. viðgerð 27. apríl 1995. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð tann 27. apríl 1995 beint í ídnaðarnevndina.

Ídnaðarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur **ein samd nevnd** undir málinum.

2. viðgerð 22. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

130 Broyting í løgtingslóg um framtaksstovn og uppskot til samtyktar viðvíkjandi framtaksfelag

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Finnbogi Ísakson, løgtingsmaður, vegna tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

I.

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lántøku til landskassan.

§ 1

Í løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1995 um lántøku til landskassan verður gjørd henda broyting í føroyska tekstinum:
Í § 1 verður í staðin fyri "framtaksstovn" sett "vinnumenningarstovn".

§ 2

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 1

I lagtingslov nr. 1 af 3. januar 1995 om lån til landskassen foretages følgende ændring i den færøske tekst:
I § 1 indsættes i stedet for "framtaksstovn" "vinnumenningarstovn".

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

II.

U p p s k o t

til

samtyktar.

Løgtingið áleggur landsstýrinum beinanvegin at fáa sett á stovn tað framtaksfelagið, sum løgtingið samhært løgtingslóg nr. 84 frá 30. mai 1994 hevur heimild at seta partapening í.

Viðmerkingar.

Eftir uppskoti frá landsstýrinum samtykti løgtingið í 1994 at heimila landsstýrinum at seta upp til 9 mió. kr. sum partapening í eitt framtaksfelag, ið var nýtt sum føroyska orðið fyri tað danska "venturescelskab". Landskassans partur í einum slíkum partafelag kundi tó í mesta lagi vera 30% av partapeninginum.

Sambært lógini kundu aðrir partaeigarar vera fíggjar- og peningastovnar,

tryggingarfeløg, vinnufeløg og onnur.

Endamálið við framtakstelagnum skuldi vera at virka við til at fremja verkætlanir við stórum útflutningsvirði. Felagið skuldi hava eina vinnuliga, virkisføra leiðslu, ið skuldi seta starvsfólk, sum kundi geva serkøna hjálp til tær verkætlanir, felagið fór uppí.

Framtaksfelagið kundi sambært lógini seta pening í vinnuligar verkætlanir, og í slíkum førum skuldi felagið útnevna nevndarlimir og veita vitan um øll neyðug viðurskifti í sambandi við fremjan av verkætlanini.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið um almennan partapening í einum framtaksfelag vísti landsstýrið til frágreiðingina frá føroysku Endurreisingarnevndini, sum mælti til at stovna slíkt felag. Endurreisingarnevndin helt eitt framtaksfelag vera ta mest realistisku skipanina til at skapa arbeiði og at vinna pening.

Sagt varð, at føroyski marknaðurin er eyðkendur av, at okkum trýtur karmar at umsita eginkapital, og at føroysk virki eru smá og tí kunnu hava ilt við at savna nóg nógva vitan um leiðslu, tøknifrøði, marknað, búskap og fígging. Hesum skuldi framtaksfelagið taka sær av. Tí var neyðugt við einari professionellari leiðslu. Møguliga kundi felagið eisini fingið fólk, sum hava arbeitt í framtaksfeløgum aðrastaðni.

Um landskassin setir 9 mió. kr. í eitt slíkt felag, verður partapeningurin tilsamans 30 mió. kr.

Felagið skuldi seta í gongd nakrar vinnuligar verkætlanir, ið kundu geva nøkur eftir okkara viðurskiftum stór ídnaðararbeiðspláss við stórum útflutningsvirði. Ætlanin var ikki, at felagið sjálvt skuldi reka vinnufyritøkurnar í óavmarkaða tíð, men selja partapening burturav, um ella tá tað vísti seg, at verkætlanirnar bóru seg og kastaðu nakað av sær. Hetta skuldi sostatt vera eitt ígongdsetarafelag. So hvørt sum felagið seldi burturav, fekk tað tøkan pening at seta í aðrar verkætlanir. Í øðrum førum noyddist felagið at avskriva pening, tí tær nýggju verkætlanirnar ikki vóru lívførar. Talan var sostatt um at stovna eitt felag við váðafúsum kapitali.

Eftir at lógin var komin í gildi, spurdi landsstýrið seg fyri hjá teimum, ið vórðu nevnd í lógini sum møguligir aðrir partaeigarar. So vítt kunnugt svaraðu øll, at tey vildu bíða at taka støðu, til løgtingsval hevði verið 7. juli 1994.

Um ársskiftið 1994/95 varð stovnaður ein føroyskur-danskur grunnur við 200 mió.kr. í stovnsfæi. Lóg um at heimila landsstýrinum at taka lán varð lýst 3. januar 1995.

Í § 1 í føroyska tekstinum í lógini um lántøku verður grunnurin nevndur "framtaksstovnur", men í danska tekstinum er heitið "erhvervsudviklingsinstitut". Her er misskiljing komin í, og skotið verður tí upp at broyta lógina um lántøku soleiðis, at orðið "framtaksstovnur" verður broytt til "vinnumenningarstovnur".

Viðtøkur fyri henda nýggja stovu vórðu gjørdar og góðtiknar um ársskiftið. Tær benda

ikki á, at "vinnumenningarstovnurin" fer at virka á sama hátt sum tað ætlaða "framtaksfelagið", ma. er onki, sum bendir á, at hesin nýggi stovnur fer at arbeiða við váðafúsum kapitali.

Tað má tí haldast at vera rætt, at framtaksfelagið fæst í gongd og arbeiðir lið um lið við "vinnumenningarstovnin".

1. viðgerð 26. apríl 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð tann 26. apríl 1995 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Á fundi við Súsonnu Danielsen, Føroya landsstýri og Tórmóð Djurhuus, adv. fekk nevndin at vita, at grunnurin á nevndarfundi tann 5. apríl 1995 samtykti at broyta danska heitið "Erhvervsudviklingsinstitut" til "Erhvervsudviklingsfond" og føroyska navnið til "Framtaksgrunnur Føroya".

Hesar broytingar eru lagdar fyri landsstýrið og eru á veg til fíggjarnevndina til góðkenningar - saman við øðrum broytingum.

Orsøkin til broytingina er, at sambært "Anordning nr. 247 af 3. maj 1993 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde" skal orðið "grunnur" ella "fond" vera partur av navninum hjá grunninum.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen og Álvur Zachariassen) heldur tað ikki vera neyðugt at broyta løgtingslóg um lántøku til landskassan í sambandi við navnabroyting hjá grunninum, tí samb. lógini um lántøku til landskassan, verður heimild givin til at læna 99 mió. kr. til at skjóta inn sum lán í **ein framtaksstovn** - navnið á stovninum verður ikki upplýst.

Meirilutin tekur heldur ikki undir við uppskotinum til samtyktar og vísir á, at danska stjórnin og Føroya løgting hava stovnsett ein 200 mió. kr. grunn til sama endamál.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar:

Hóast Fólkaflokkurin var sera ivasamur tá lógin um framtaksgrunnin varð samtykt við

árslok 1994, so má tað vera ein sjálvfylgja, at grunnurin verður skrásettur í Føroyum, og har krevur lógin, at "grunnur" framgongur av navninum.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) setir tí fram soljóðandi

u p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lántøku til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1995 um lántøku til landskassan verður gjørd henda broyting í føroyska tekstinum:

Í § 1 verður í staðin fyri "ein framtaksstovn" sett "Framtaksgrunn"

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðvíkjandi uppskotinum til samtyktar. Minnilutin tekur ikki undir við uppskotinum og vísir til viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 173/1993.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen) setir í staðin fyri uppskot tjóðveldisfloksins fram soljóðandi

u p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lántøku til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1995 um lántøku til landskassan verður gjørd henda broyting í føroyska tekstinum:

Í § 1 verður í staðin fyri "framtaksstovn" sett "vinnumenningargrunn".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Sami minniluti (Finnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið til samtyktar.

2. viðgerð 29. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Framhaldandi 2. viðgerð 31. mai 1995. Uppskot tjóðveldisfloksins fullu við 9-0 atkvøðum. Broytingaruppskot minnilutans (Anfinn Kallsberg) fall við 8-0 atkvøðum og broytingaruppskot minnilutans (Finnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen) fall við 12-0 atkvøðum.

131 Broyting í løgtingslóg um stuðul til nýggjar vinnur

Ár 1995, rýsdagin 18. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til nýggjar vinnur.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 17 frá 1. februar 1995 um stuðul til nýggjar vinnur verður § 1, stk. 4 orðað soleiðis:

"**Stk. 4.** Studningur eftir stk. 1 verður:

Til 31. desember 1995: 30%.

Frá 1. januar 1996 til 30. juni 1996: 25%.

Frá 1. juli 1996 til 31. desember 1996: 20%.

Frá 1. januar 1997 til 30. juni 1997: 15%.

Frá 1. juli 1997 til 31. desember 1997: 10%.

Frá 1. januar 1998 til 30. juni 1998: 5%."

§ 2.

Vinnur, sum fáa annan almennan stuðul,

lagtingslov om ændring i lagtingslov om tilskud til nye erhverv.

§ 1.

I lagtingslov nr. 17 af 1. februar 1994 om støtte til nye erhverv affattes § 1, stk. 4 således:

"**Stk. 4.** Støtten iflg. stk. 1 bliver:

Til 31. december 1995: 30%.

Fra 1. januar 1996 til 30. juni 1996: 25%.

Fra 1. juli 1996 til 31. december 1996: 20%.

Fra 1. januar 1997 til 30. juni 1997: 15%.

Fra 1. juli 1997 til 31. december 1997: 10%.

Fra 1. januar 1998 til 30. juni 1998: 5%."

§ 2.

Erhverv, der modtager anden offentlig

hava ikki rætt til studning eftir hesi lóg.

§ 3.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

støtte, er ikke berettiget til støtte efter denne lov.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Sambært teim upprunaligum tankunum, sum lógu til grund fyri lógini um stuðul til nýggjar vinnur, skuldi stuðulin minka so líðandi yvir eitt áramál. Í tí endaligu lógini er minkingin í stuðlinum tó heldur lítil, úr 28% tey tvey fyrstu árini niður í 21% tað triðja árið.

Nevndin, ið er sett at umsita lógina um stuðul til nýggjar vinnur, hevur heitt á landsstýrið um at broyta lógina, so ein verulig minking verður í stuðlinum tey trý árini lógin virkar. Nevndin grundar sína áheitan á, at ein minking í stuðlinum fer at eggja tær fyritøkur, ið fáa stuðul, til at gerast sjálvbjargnar, áðrenn stuðulsskeiðið er úti.

Nevndin heldur eisini, at við núverandi skipan fer at valda ein órímiliga stór óvissa, bæði fyri fyritøkur og fíggjarstovnar um, hvat fer at henda, tá ið skipanin fer úr gildi tann 31. mars 1998, tí stuðulsprosentið er so høgt, tá ið lógin fer úr gildi.

Nevndin heldur ikki, at stuðulsskeiðið eigur at verða longt, hóast ein minkar um stuðulin í mun til verandi lóg, tí um ein fyritøka ikki er vorðin sjálvbjargin innan trý ár, so eru møguleikarnir fyri í longdini at gerast sjálvbjargin ikki stórir.

Landsstýrið tekur undir við sjónarmiðinum hjá nevndini. Landsstýrið vil fegið stuðla nýggjum virksemi at koma í gongd í Føroyum, men tað leggur dent á, at virksemið í longdini skal klára seg uttan stuðul. Tí er tað rætt at eggja tær fyritøkur, sum fáa stuðul, til at gerast sjálvbjargnar. Minkingin eigur tó at fara fram so líðandi yvir stuðulsskeiðið, so fyritøkurnar kunnu fóta sær so hvørt: úr 30% minkar stuðulin við 5% hvørt hálvár niður í 5% tað síðsta stuðulsskeiðið í 1998.

Landsstýrið er varugt við, at tað er trupult at gera av, hvørjar fyritøkur umboða nýggjar vinnur. Somuleiðis í hvønn mun tær nýggju vinnurnar koma í staðin fyri verandi vinnur og harvið ikki økja um skattagrundarlagið, men bert um stuðulsútreiðslur landskassans. Men við at broyta stuðulsskipanina, soleiðis sum skotið er upp, minkar tann umsitingarligi vandin munandi.

Landsstýrið leggur eisini dent á, at tær ymsu stuðulsskipanirnar verða samskipaðar soleiðis, at fyritøkur, ið fáa annan almenna stuðul, ikki eisini fáa stuðul eftir hesi lóg.

1. viðgerð 26. apríl 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð tann 26. apríl 1995 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur undir viðgerðini av málinum havt fund við Óla Jacobsen, landsstýrismann.

Á fundinum mælti landsstýrismaðurin nevndini til at broyta ásetingarnar í §§ 1 og 2.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Út frá tilmælinum hjá landsstýrismanninum setir **meirilutin** (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariassen og Tordur J. Niclasen) í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

broytíngaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til nýggjar vinnur.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 17 frá 1. februar 1995 um stuðul til nýggjar vinnur verður § 1, stk. 4 orðað soleiðis:

"**Stk. 4.** Studningur eftir stk. 1 verður:
Til 31. desember 1995: 30%.
Fyrra hálvár 1996: 30%.
Seinna hálvár 1996: 25%.
Fyrra hálvár 1997: 20%
Seinna hálvár 1997: 15%.
Fyrra hálvár 1998: 15%.
Seinna hálvár 1998: 10%.
Fyrra hálvár 1999: 5%."

§ 2.

Vinnur, sum fáa studning samb. § 1, a í lógini um ábyrgdargrunn, koma ikki undir hesa lóg.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om tilskud til nye erhverv.

§ 1.

I lagtingslov nr. 17 af 1. februar 1994 om støtte til nye erhverv affattes § 1, stk. 4 således:

"**Stk. 4.** Støtten iflg. stk. 1 bliver:
Til 31. december 1995: 30%.
Første halvår 1996: 30%.
Andet halvår 1996: 25%.
Første halvår 1997: 20%.
Andet halvår 1997: 15%.
Første halvår 1998: 15%.
Andet halvår 1998: 10%.
Første halvår 1999: 5%.

§ 2.

Erhverv, der modtager støtte iflg. § 1, a i lov om garantifond, er ikke berettiget til støtte efter denne lov.

§ 3.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) førir fram:

Tá lógin um stuðul til nýggjar vinnur, løgtingsmál nr. 62/1994 varð samtykt í vár, hevði nevndarlimur okkara í skattanevndini hesar viðmerkingar:

"Síðan 1989 hevur fólkaflokkurin vist á tað neyðuga í at lækka kostnaðarstøðið fyri at fáa lønsemi aftur í samfelagið. Hóast tað hevur verið tungt at fingið ljóð fyri hesum, eru tað fleiri og fleiri, ið ásanna tað neyðuga í hesum. Tó tykist landsstýrið bert at taka ein part í senn, og hesa ferð eru tað nýggjar vinnur, ið royndur verður gjørd at fáa lønsamar.

Landskassin brúkar ov nógv í mun til inntøkurnar, vinnulívið skal gjalda ov nógv, meðan lønin er góð, men fólkið fær einki av henni. Lønsemið í øllum samfelagnum er avskeplað.

Í staðin fyri at lekja sjúklingin, ger landsstýrið fleiri royndir at lekja symptomini, og tað er hóast alt ein bati, sum vónandi til endans fær lekjaran at gera tað neyðuga.

Kostnaðarstøðið fyri fiskiskip er ov høgt, og tí verður latin íløgustuðul. At framleiða úr frystum fiski er ov dýrt, og tí verður har latin kilostuðul. At byggja hús er ov dýrt, og tí verður latin rentufrádráttur. Umvæling av húsum og nú eisini av bilum er staðfest ov kostnaðarmikið, og letur landskassin frádrátt í skattinum til hesi endamál, og nú standa nýggjar vinnur fyri tørni. Soleiðis kundi ein hildið fram við stuðulshættum, sum eru til, tí politikarar hava staðfest, at kostnaðarstøðið í samfelagnum er ov høgt.

Framvegis eru neyðlíðandi vinnur, sum ikki sleppa undir eina kostnaðarstøðislækking. Ein stórur partur av hesum hevur fyri neyðini eina lækking, um tey arbeiðsplássini ikki eisini skulu fara fyri bakka.

Tann stóri trupulleikin við hesum uppskotinum er, hvussu ein nýggj vinna skal definerast. Undir nevndarviðgerðini er upplýst, at ómøguligt er at gera nágreiniligar reglur um, hvat ein nýggj vinna er, men at avgerð um, hvør vinna kann metast sum nýggj, verður tikin av nevnd við sakkønum fólki, sum landsstýrið velur, og avgerð nevndarinnar kann ikki kærast. Tað verður tí upp til nevndina, hvussu henda lóg kemur at virka.

At tað verður trupult at avgera, hvør kemur undir nýggja vinnu, kom best fram undir nevndarviðgerðini, tá tveir limir úr arbeiðsbólkinum, ið skrivaðu álit um arbeiðsskapandi politikk, úttalaðu seg. Annar segði, at markið millum nýggjar og gamlar vinnur verður ein "ræðuligur trupulleiki". Upp á spurning frá nevndarlimum, um klippfiskur var nýggj vinna, svaraðu báðir ja, men um 5 virki fóru undir at framleiða

klippfisk, svaraði annar, at so fáa vit 80-ini umaftur, meðan hin segði, at tá máttu allir koma undir skipanina. At tað er trupult at seta markið, er eyðsýnt.

Tað eru tríggir møguleikar at áseta markið:
1. at nevndin verður afturhaldin, og mest sum einki kemur burturúr,
2. at nevndin ikki verður afturhaldin, og mest sum alt kemur undir, ella
3. at nevndin finnur ein millumveg.

Nevndin fer ivaleyst at leggja seg eftir at finna millumvegin, men tá er vandi fyri ónøgd og kanska eisini órættvísi, nevniliga at hesin sleppur undir og hasin ikki.

Hetta uppskotið er sum áður nevnt ein ásannan av, at kostnaðarstøðið er ov høgt, men røkkur bert fyri ávís virkir. Hetta hjálpir munandi um hjá summum, og út frá tí heldur at hjálpa summum enn ongum .at hjálpa verður mælt til at samtykkja uppskot landsstýrisins við teirri vón, at kostnaðarstøðið verður lagað til alt samfelagið innan alt ov langa tíð.

Hóast tað ikki eru 4 mánaðir síðani lógin varð samtykt, biður landsstýrið longu um at fáa broytingar.

Ætlanin við lógini var at fáa nøkur fleiri arbeiðspláss, men enn er onki komið.

Uppskotnu broytingarnar koma helst at viðføra, at heldur onki nýtt arbeiðspláss kemur í framtíðini, um hesar verða samtyktar.

Hevði uppskotið í staðin verið ein lækking eftir hesi lóg við t.d. 5% um árið, og at allar fyritøkur fingu eina lækking av kostnaðarstøðinum (uppskot fólkafloksins) uppá t.d. 5%, so hevði uppskotið vent rætta vegin. Allir flokkar á tingi hava jú ásannað, at kostnaðarstøðið í Føroyum er ov høgt og ger, at vit missa fleiri og fleiri arbeiðspláss.

Minnilutin mælir tí frá at samtykkja uppskot landsstýrisins, og setir í staðin fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at koma við uppskoti, sum hækkar afturberingarnar av lønarútreiðslunum hjá ávísum virkjum, samstundis sum kostnaðarstøðið hjá altari vinnuni verður lækkað við somu upphædd, við fullum skattaendurgjaldi.

Ein annar minniluti (Finnbogi Ísakson) tekur undir við uppruna uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 24. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Við Atkvøðugreiðsluna 26. mai 1995 varð broytingaruppskot nevndarinnar samtykt við 19-0 atkvøðum, uppskot landsstýrisins fall burtur. Uppskot minnilutans til samtyktar fall við 4-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Málið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

Lóg nr. 91 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 820-3/94.

132 Setan av nevnd at gera uppskot til nýggja kommunala skipan

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur undir við, at sett verður ein nevnd - kommununevnd - at gera uppskot til nýggja kommunuskipan. Uppskotið verður gjørt við støði í teimum høvuðssjónarmiðum, sum ganga fram av uppskoti til kommissorium, sum er lagt við sum skjal til løgtingsmálið.

Viðmerkingar

Í samgonguskjalinum er avtalað, at broytingar skulu gerast í kommunuskipanini, bæði viðvíkjandi uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur og viðvíkjandi kommunuupphýtinum.

Landsstýrið heitti tí í oktober 1994 á nøkur embætisfólk í landsumsitingini um samsvarandi samgonguskjalinum at gera uppskot til landsstýrið um kommissorium fyri

eina kommununevnd at gera uppskot um eina nýggja kommunala skipan.

Embætisbólkurin hevur nú gjørt uppskotið, sum er hjálagt, og hevur samstundis gjørt eitt upprit (hjálagt) í sambandi við uppskotið til kommissorium. Uppskotið til kommissorium og uppritið er við skrivi dagfest 14. februar 1995 frá embætisbólkinum latið landsstýrinum.

Av tí at talan er um umfatandi broytingar, sum skulu gerast í kommunuskipanini, og harvið eisini eínum stórum parti av allari almennari fyrisiting í Føroyum, hevur landsstýrið gjørt av at leggja málið fyri løgtingið til eitt opið og fordómsfrítt orðaskifti.

Tað er landsstýrinum greitt, at hetta á mangan hátt er eitt sera viðbrekið mál, og eitt mál av tílíkum slag, har tinglimir í síni støðutaka ikki nýtast at kenna, at teir eru bundnir at vanligum fyriliti til partapolitikk.

Høvuðstrupulleikarnir við verandi kommunuskipan er samanblandingin av avgerðar- og ábyrgdarøkinum hjá ávikavist landsmyndugleikum og kommunalum myndugleikum, sum kemst av, at kommununurnar eru ov smáar at loysa kommunalu uppgávurnar uttan stuðul frá landsmyndugleikum/landskassa. Hetta ger, at kommununurnar sjálvar lítið ella einki veruligt vald hava á telmum kommunalu uppgávunum, og at fíggjarligu avleiðingarnar og ábyrgdin av uppgávunum ikki verða staðfestar nóg væl og nóg skjótt.

Høvuðsendamálið við at umleggja kommunuskipanina er at styrkja kommunala sjálvræðið og ábyrgdina solciðis, at tær kommunalu uppgávurnar kunnu verða loystar skilabetri og búskaparliga meira forsvarligt.

Kommunalu uppgávurnar eiga at tillagast fíggjarligu orkuni hjá kommununum, og m.a. tí er neyðugt, at avgerðarmyndugleikin og ábyrgdin eru á einum og sama stað, og ikki, sum nú, bæði hjá landsmyndugleikum og kommunalum myndugleikum.

Skulu kommununurnar hava veruligan avgerðarrætt og veruliga ábyrgd fyri kommunalu uppgávunum, er neyðugt, at kommununurnar við eini heildarveiting fíggjarliga eru førar fyri at bera uppgávurnar sjálvar, uttan at neyðugt er at leita sær hjálp uttanfyri kommunumark, hjá landsmyndugleikum ella øðrum kommunum. Fíggjarliga grundarlagið hjá kommununum má tí styrkjast, m.a. við at kommununurnar verða lagdar saman í størri eindir.

Landsstýrið metir tí, eins og nevnt er í uppritinum, at í veruleikanum eru bert tveir vegir at fara:

1. Fleiri av uppgávunum, sum nú eru kommunalar, verða tiknar frá kommununum og lagdar til landsmyndugleikar at umsita.

2. Kommununurnar verða lagdar saman í størri eindir, so kommununurnar kunnu taka ta fullu ábyrgdina av uppgávunum, sum nú eitast at vera kommunalar, og við møguleika at yvirtaka aðrar uppgávur, sum landsmyndugleikarnir nú umsita.

Eftir uppskotinum til kommissorium, skal kommununevndin, sum setast skal, gera uppskot um nýggja kommununskipan, ið fevnir um: nýtt kommununuppbýti, nýtt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, heruppií nýggja studulsskipan frá landskassanum til kommunurnar.

Fyrr enn kommununevndin hevur gjørt sítt arbeiði, ber sjálvandi ikki til at siga neyvt, hvussu ein nýggj kommununskipan fer at síggja út, hvussu nógvar kommununar verða og hvussu geografiska uppbýtið verður, hvørjar uppgávur tær skulu hava, og hvussu fíggingin og stýrisskipanin skal verða. Men verður hetta uppskotið samtykt, og verða kommununar lagdar saman eftir teimum meginreglum, sum nevndar eru í hesum uppskotinum til kommissorium, verða høvuðsbroytingarnar í kommununskipanini hesar:

Kommununuppbýtið.
Talið á kommununum verður skorið niður úr 50 til í mesta lagi 10.

Uppgávur.
Avgerðarrætturin og medábyrgdin hjá landsmyndugleikum og/ella kommunalum samstarvum fyri, hvussu kommunalu uppgávurnar verða loystar, t.d. viðvíkjandi bygging av havnum og skúlum, verður fluttur/flutt til tær einstøku kommununar, og møguleiki verður fyri at leggja fleiri uppgávur til kommununar.

Fígging.
Prosentvísa endurgjaldið úr landskassanum til kommununar verður avtikið, og í staðin fyri fáa kommununar eina heildarveiting.

Skuldartrupulleikin.
Í sambandi við eina samanlegging er hetta ein serligur trupulleiki, og kommununevndin skal tí eisini kanna og koma við tiltuæli um, hvussu ein skiftisskipan kann gerast, soleiðis, at ein samanlegging ikki fer at kennast fíggjarliga órímilig.

Bygdirnar.
Landsstýrið ásannar serligu viðurskiftini hjá bygdunum, og at tær bygdirnar, sum hava kommunu fyri seg, í ein ávísan mun av røttum kunnu óttast fyri, at tær við eini samanlegging við aðrar størri kommunur verða við skerdan lut. Kommununevndin skal tí kanna og koma við tilmæli um, hvønn leiklut bygdirnar kunnu fáa í eini nýggjari skipan.

Framferðarháttur við kommununsamanleggingum.
Eftir galdandi lóggávu er bert heimild til sjálvbodna kommununsamanlegging, og hetta er eisini útgangsstøðið fyri tí arbeiðinum, sum nú verður gjørt. Samanleggingarnar fara fram eftir tí ætlan, sum landsstýrið og løgting hava samtykt eftir tilmæli frá kommununevndini.

Kommununevndin skal umhugsa at gera eina serliga samanleggingarlóg um, hvussu fram skal farast, tá kommunur verða lagdar saman.

Nevndararbeiðið.
Nevndararbeiðið fer fram eftir fastari arbeiðsætlan, sum er býtt upp í tættir, og skal nevndin lata ávegis álit frá sær, so hvørt sum partar av arbeiðinum eru loknir. Ávegis og endaligt álit verða send til ummælis til kommunurnar ella møguliga til ein serligan bólk av kommunupolitikarum og landspolitikarum, sum setast kann í hesum sambandinum.

Roknað verður við, at nevndin kann lata endaligt álit frá sær síðst í 1996.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. apríl 1995 og varð eftir 1. viðgerð tann 2. mai 1995 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og kann staðfesta, at talan er um eina avmarkaða støðutaksan, sum kann lutast sundur í tveir høvuðsspurningar, nevniliga um setast skal ein kommununevnd at gera uppskot til nýggja kommunala skipan, og í framhaldi av hesum, um hetta skal gerast við støði í teimum høvuðssjónarmiðum, sum koma til sjóndar í viðlagda uppskoti til kommisorium.

Rættarnevndin kann í fyrstu atløgu mæla til, at tikið verður undir við, at sett verður nevnd at gera uppskot til nýggja kommunala skipan, tá tað er greitt, at ovurstórur tørvur er á at endurskoða alla kommunalu lóggávuna, sum nú er vorðin gomul og á mangan hátt ótíðarhóskandi.

Vegna tess, at skotbráðið hevur verið alt ov stutt til at viðgera eitt so týdningarmikið mál, og stundir ikki hava verið til at sett seg nóg væl inn í allar spurningarnar, mælir ein **meiriluti** (Helena Dam á Neystabø, Marita Petersen og Signar á Brúnni) í rættarnevndini til, at málið verður beint í millumtinganevnd, sum síðani leggur fram nýtt álit í komandi tingsetu.

Ein minniluti í rættarnevndini (Bjørn á Heygum og Bjarni Djurholm) tekur undir við, at málið verður framlagt og setur fram soljóðandi álit.

Til viðlagda kommisorium hevur ein minniluti í rættarnevndini hesar viðmerkingar:

A. Undir hesum punkti, sum miðar ímóti:

1. At útgreina búskaparliga grundarlagið hjá kommununum.

2. At lýsa demografisku og geografisku viðurskiftini.

3. At greina út formligu og óformligu viðurskiftini millum land og kommunu, t.e. m.a. uppgávu og ábyrgdarbýti og fíggjarlig viðurskilti.

4. At greina út umsitingarligu viðurskiftini, herundir kommunal samstørv.

Tikið verður undir við, og mælt til, at løgtingið góðtekur, at hesin arbeiðssetningurin myndar grundarlag undir arbeiðinum hjá nevndini.

B. Undir hesum punkti, har nevndin skal koma við tilmæli um:

1. Hóskandi tal og støðd á kommununum.

2. Hóskandi uppgávu- og ábyrgdarbýti við støði í B1.

3. Heildarveitingarskipan frá landskassanum til kommununar.

4. Kommunala útjavningarskipan og møguligar skiftisreglur.

Tikið verður undir við, og mælt verður til, at pkt. 1 og 2 verða grundarlag undir tilmælinum frá kommununevndini.

Viðvíkjandi spurningunum um heildarveitingarskipan og útjavningarskipan, so verður mett, at hóskiligari hevði verið við einum meira liðiligari arbeiðssetningi, sum ikki frammanundan treytaleyst bant okkum til ávikavist eina heildarveitingarskipan frá landskassanum og eina útjavningarskipan millum einstøku kommununar.

Mælt verður tískil ístaðin til, at pkt. 3 verður orðað soleiðis:

Møguliga heildarveitingarskipan frá landskassanum til kommununar.

Pkt. 4 verður orðað soleiðis: Møguliga kommunala útjavningarskipan og skiftisreglur.

Í sambandi við broytingar í kommunalu skipanini, skal nevndin koma við tilmæli um neyðugar broytingar í ávísum formligum viðurskiftum:

1. Kommunulóggávan skal eftirkannast í síni heild, t.v.s. dagførast og gerast greiðari.

2. Kreppulógirnar skulu innarbeiðast og samskipast við kommunulóggávuna.

3. Reglur um fíggjarstýring, t.e. fíggjarætlan, bókhald, roknskaparviðurskifti, reglur um lántøku og veðhaldsbindingar.

4. Avmarkingar mótvegis privata vinnulívinum.

5. Ásetingar um kommunal samstørv.

6. Vísa á neyðugar broytingar í serlóggávuni.

Tikið verður undir við og mælt verður til, at løgtingið góðkennir, at frammanfyri nevndu arbeiðssetningar verða nýttir sum grundarlag undir arbeiðinum hjá nevndini, undantikið pkt. 2, har tað er ásett, at kreppulógirnar skulu innarbeiðast og samskipast við kommunulóggávuna.

Mett verður ikki, at tað er heppið soleiðis at innarbeiða kreppulógirnar í aðra lóggávu, tá hetta lættliga kann fatast sum, at kreppan hervið er vorðin nærum eitt varandi fyribrigdi. Grundsjónarmiðið má vera, at kreppulógirnar eru ein fyribils loysn, sum vónandi kunnu setast úr gildi aftur innan lutfalsliga stutta tíð. Tískil verður skotið upp, at atlit ístaðin verður tikið til kreppulógirnar, og at hesar bert í tann mun, hetta er neyðugt, verða partur av kommunulóggávuni.

Pkt. 2 verður sostatt orðað soleiðis: Kommunulóggávan verður gjørd við atliti til fyribils kreppustøðuna í landinum, og verða serlógirnar innarbeiddar í hesa lóggávu í tann mun, hetta er neyðugt.

Samb. uppskotinum skulu høvuðssjónarmiðini og meginreglurnar í arbeiðinum hjá nevndini í minsta lagi vera:

1. Figgjarlig ábyrgd fylgir avgerðarrættinum.

2. Uppgávurnar verða loystar so nær borgarunum, sum til ber.

3. Uppgávurnar verða loystar samfelagsbúskaparliga ráðiligt.

4. Borgararnir fáa greiða fatan av kostnaðinum av virkseminum hjá kommununi.

5. Kommununum skulu bert áleggjast uppgávur, ið tær kunnu fyrisita sjálvstøðugt. Uppgávubýtið millum land og kommunu verður avgjørt eftir minsta felagsnevnara. T.v.s. eingin kommuna fær aðrar uppgávur enn tær, sum tann minsta eindin er før fyri at umsita.

6. Kommunurnar skulu hava eina tilíka stødd, at íbúgvaratal í kommununum, vinnumøguleikar og geografiska økið gevur hóskandi grundarlag fyri, at kommunurnar sjálvstøðugt kunnu fyrisita/figgja tær kommunalu uppgávurnar.

7. Rættartrygdin skal tryggjast.

8. Tjóðbúskaparlig stýring.

Tikið verður undir við og mælt verður til, at endamálsorðingin í frammanfyri umrøddu meginreglum verða fylgdar, tó við fyrivarni um, at minsti felagsnevnarin undir pkt. 5 verður strikaður. Mett verður ikki, at tað er ráðiligt at avmarka uppgávurnar hjá størru kommununum til tær, sum minsta eindin í skipanini er før fyri at umsita. Tað er

nevniliga eyðvitað, at munurin í støddd, orku og førleika altíð fer at vera stórur, og at ovurstórur vandi tískil verður fyri, at uppgávur verða miðsavnaðar, sum lættliga og enntá nógv betur kunnu avgreiðast av teimum størru kommunalu eindunum. Mælt verður sostatt til, at pkt. 5 verður avmarkað til fyrsta setningin um, at kommunum bert kunnu verða álagdar uppgávur, sum tær kunnu fyrisita sjálvstøðugt, og skal hetta verða gjørt við atliti til m.a. geografiska støddd, fólkatal, fíggjarorku og umsitingarligar fortreytir og førleika v.m.

Tikið verður undir við og mælt verður til, at allir partar, sum verða fevndir av hesum arbeiði, verða hoyrdir og fáa møguleika fyri at ávirka arbeiðið umframt loypandi verða kunnaðir um gongdina. Eisini verður tikið undir við at kanna møguleikarnar fyri hvønn leiklut, bygdirnar skulu hava í eini nýggjari kommunalari skipan. Mælt verður somuleiðis til, at nevndin kannar, hvussu støðan hjá útoyggjunum verður í eini nýggjari kommunalari skipan.

Viðvíkjandi uppskotinum um, at kommununevndin verður mannað við 4 umboðum frá miðfyrisitingini og 3 umboðum frá kommunum, sum øll eru embætismenn, skal rættarnevndin viðmerkja, at vandi er fyri rættuliga einvísum sjónarmiðum uttan neyðugt fakligt innlit og royndir innan einstøku málsøki, um bert embætismenn í miðfyrisitingini og einans 3 umboð fyri kommunurnar skulu avgreiða eitt tílíkt stórarbeiði.

Skotið verður tískil upp, at nevndin ístaðin verður mannað av serfrøðinginum innan tey ymsu málsøkini t.d. ein úr Tinganesi, sum skal vera løgfrøðingur, ein fyri Landsskúlafyrisitingina, ein fyri Almannastovuna, ein fyri Landsverkfrøðingin, og at kommunala umboðanin verður økt úr trimum í fýra limir, lutað sundur í mun til støddd av kommunum.

At enda kann viðmerkjast, at minnilutin í rættarnevndini heldur tað ikki vera ráðiligt frammanundan at avmarka talið av kommunum til í mesta lagi 10. Mett verður meira skilagott at miða ímóti einum tílíkum hægstamarki, tó soleiðis, at talið kann verða hækkað, um avgerandi fyrilit tala fyri hesum.

Við hesum viðmerkingum mælir minnilutin í rættarnevndini, Bjørn á Heygum og Bjarni Djurholm, løgtinginum til at samtykkja Løgtingsmál nr. 132/1994 við umrøddu viðmerkingum og broytingum til kommisorium.

Ein **meiriluti í rættarnevndini**, Signar á Brúnni, Helena Dam á Neystabø og Marita Petersen, mæla løgtinginum frá at samtykkja uppskotið, men setir ístaðin fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Rættarnevndin verður millumtinganevnd at viðgera løgtingsmál nr. 132/1994: Setan av nevnd at gera nýggja kommunala skipan og leggur fram álit í málinum í seinasta lagi áðrenn 1. oktober 1995.

2. viðgerð 30. mai 1995. Uppskot meirilutans til samtyktar samtykt við 18-0 atkvøðum.

133 Broyting í ymsum løgtings- og ríkislógum í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Landbúnaðarmál)

Ár 1995, hósdagin 20. aprtl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í ymsum ríkis- og løgtingslógum, sum viðvíkja landbúnaðarmál v.m., í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Landbúnaðarmál).

§ 1

Í lóg fyri Føroyar nr. 36 frá 28. februar 1908 um tiltøk ímóti smittandi sjúkum hjá húsdýrunum v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 15 frá 13. mars 1951, verða gjørdar hesar broytingar:

lagtingslov om ændring af forskellige rigs- og lagtingslove på landbrugsområdet, i forbindelse med at styrelsesordningsloven træder i kraft. (Landbrugsområdet).

§ 1

I lov for Færøerne nr. 36 af 28. februar 1908 om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme hos husdyrene m.m., som senest ændret ved lagtingslov nr. 15 af 13. marts 1951, foretages følgende ændringer:

1) Í § 1 stk. 1, § 6, § 10 stk. 1 og stk. 3, § 11 stk. 1, 4 og 6 og § 14 verður "husdyrkommisionen" strikað og í staðin sett "landsdjóralæknin"

2) § 9 verður orðað soleiðis:
"**§ 9.** Leiðslan av teim fyriskipanum, sum annars verða at seta í verk av tí almenna fyri at forða, at smittandi sótt millum húsdjórini breiðir seg (§ 10) verður í houdunum á landsdjóralæknanum

Stk. 2. Løgreglan eins væl og kommunalir myndugleikar hava skyldu at veita landsdjóralæknanum lið tá ið neyðug møgulig tiltøk skulu fremjast á staðnum fyri at berja niður sjúku."

§ 2

Í lóg nr. 84 frá 31. mars 1926 fyri Føroyar "om landvæsenskommissioner" verða í øllum førum orðini "lagtinget" broytt til "landsstýrið".

§ 3

Í lóg nr. 169 frá 18.05.1937 "for Færøerne om Benyttelse af Indsøer og Vandløb" verður í § 1, stk. 3 orðini "Staten efter lagtingets indstilling" strikað, og í staðin sett: "landsstýrið".

§ 4

Í lóg nr. 147 frá 27. mars 1939 "om udskiftning" verður í § 8, stk. 2 orðið "lagtinget" strikað, og í staðin sett: "landsstýrið".

§ 5

Í løgtingslóg nr. 53 frá 27. november 1952 um viðarlundir, sum broytt við løgtingslóg nr. 58 frá 22. august 1975 verður § 2, stk. 2 orðað soleiðis:
"**Stk. 2.** Í nevndini sita 5 limir valdir av landsstýrinum. Nevndin skipar seg sjálv."

1) I § 1 stk. 1, § 6, § 10 stk. 1 og stk. 3, § 11 stk. 1, 4 og 6, § 14 udgår "husdyrkommisionen" og i stedet indsættes "landsdyrlægen"

2) § 9 stk. 1 og 2 affattes således:
"**§ 9.** Ledelsen af de foranstaltninger, der iøvrigt vil være at træffe af det offentlige til bekæmpelse af udbrudt smitsom sygdom blandt husdyrene (§10) påhviler landsdyrlægen.

Stk. 2. Politiet såvel som de kommunale myndigheder er forpligtede til at bistå landsdyrlægen ved gennemførelse af de fornødne og efter de stedlige forhold mulige foranstaltninger til sygdommens bekæmpelse."

§ 2

I lov nr. 84 af 31. marts 1926 for Færøerne om landvæsenskommissioner erstattes i alle tilfælde ordet "lagtinget" med "landsstyret".

§ 3

I lov nr. 169 af 18.05.1937 for Færøerne om Benyttelse af Indsøer og Vandløb udgår i § 1, stk. 3 ordene "Staten efter lagtingets indstilling", og i stedet indsættes "landsstyret".

§ 4

I lov nr. 147 af 27. marts 1939 om udskiftning udgår i § 8, stk. 2 ordet "lagtinget" og i stedet indføjes "landsstyret".

§ 5

I lagtingslov nr. 53 af 27. november 1952 om plantager, som ændret ved lagtingslov nr. 58 af 22. august 1975 tilføjes i § 2, stk. 2:
"**Stk. 2.** Udvalget består af 5 medlemmer valgt af landsstyret. Udvalget konstituerer sig selv."

§ 6

Í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um natúrfriðing verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 10 verður orðað soleiðis:
"§ 10. Í hvørjari sýslu verður friðingarnevnd sett við sýslumanninum sum formanni og 2 øðrum limum, sum landsstýrið velur fyri 6 ár í senn. Fyri sama tíðarskeið velur landsstýrið 4 tiltakslimir fyri teir av landsstýrinum valdu limunum."

2) Í § 11 verður í tveimum støðum orðið "løgtingið" strikað og ístaðin verður sett: "landsstýrið".

§ 7

Í løgtingslóg nr. 78 frá 21.05.1982 um loðdjórahald § 1 verða orðini "og skal henda reglugerð verða góðkend av løgtingsins lóganevnd" strikað.

§ 8

Í løgtingslóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð, sum broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 12. juni 1990 og løgtingslóg nr. 49 frá 8. mai 1991 verður § 3 orðað soleiðis:
"§ 3. 3 limir og 3 tiltakslimir eru í Jarðarráðnum. Landsstýrið velur limirnar fyri fýra ár í senn. Ein av limunum skal hava landbúnaðarinnlit, ein innlit í útlánsvirksemi við peningi og ein í fyrisiting. Ráðið skipar seg sjálvt."

§ 9

Henda løgtingslóg fær gildi Ólavsøkudag 1995.

Stk. 2. Nýval av øllum nevndum sum nevndar verða í hesi løgtingslóg fer fram eftir at lógin hevur fingið gildi og í seinasta lagi 01.10.1995. Hesar nevndir verða hereftir valdar sbr. ásetingum lógarinnar ella sbr. siðvenju

§ 6

I lagtingslov nr. 48 af 9. juli 1970 om naturfredning foretages følgende ændringer:

1) § 10 affattes således:
"§ 10. I hvert syssel oprettes et fredningsnævn bestående af sysselmanden som formand og 2 andre medlemmer, som landsstyret vælger for 6 år. For samme periode vælger landsstyret 4 suppleanter for de landsstyresvalgte medlemmer"

2) I § 11 udgår to steder ordene "lagtinget" og i stedet indsættes "landsstyret"

§ 7

I lagtingslov nr. 78 af 21.05.1982 om pelsdyrhold udgår i § 1 ordene "og dette reglement skal være godkendt af lagtingets lovudvalg".

§ 8

I lagtingslov nr. 59 af 9. juni 1988 om landsjord, som ændret ved lagtingslov nr. 66 af 12. juni 1990 og lagtingslov nr. 49 af 8. maj 1991 affattes § 3 således:
"§ 3. Landbrugsrådet har 3 medlemmer og 3 suppleanter. Landsstyret vælger medlemmerne for fire år. Et af medlemmerne skal have landbrugsindsigt, et medlem indsigt i udlånsvirksomhed med penge og et i forvaltning. Rådet konstituerer sig selv."

§ 9

Denne lagtingslov træder i kraft olaidag 1995.

Stk. 2. Ekstraordinært valg af alle udvalg og nævn der nævnes i denne lagtingslov foretages efter lovens ikrafttræden og senest 01.10.1995. Disse nævn og udvalg udpeges herefter pårny efter lovens bestemmelser eller i.h.t. sædvane.

Viðmerkingar:

Løgtingið álegði landsstýrinum við løgtingssamtykt 28.06.1994 at leggja fyri løgtingið innan 1. januar 1995:

- Uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið,
- uppskot til løgtingslóg, og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnir til ríkislóg, sum leggur allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið,
- uppskot til løgtingslóg og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnir til ríkislóg, sum tekur av fyrisitingarligan myndugleika hjá nevndum, stýrum og ráðum og leggur hann til landsstýrið í teim førum, tá ið nevndin, stýrið ella ráðið ikki umboðar serligan yrkiskunnleika ella serlig áhugamál, men bert vanlig politisk áhugamál,
- uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna soleiðis, at hon verður lagað til samtykta stýrisskipanarlógaruppskotið.

Samsvarandi hesi samtykt verður hetta uppskot, sum fevnir um landbúnaðarmál, har allar fyritingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum verða avtiknar og heimildir løgtingsins at velja nevndar- ella stýrislimir verða lagdar landsstýrinum, lagt fyri løgtingið.

Viðmerking til einstakar greinir:

§ 1. Skotið verður upp, at húsdýranevndin verður avtikin og heimildin løgd landsdjóralæknanum. Skipanin er frá eini tíð tá eingin landssdjóralæknastovnur var í Føroyum og er tí í ótíðarhóskandi í dag.

§ 8: Eftir uppskotinum er talið av nevndarlimum í jarðarráðið sett til tríggjar samstundis sum áætt verður at ráðslimirnir skulu veljast eftir ávísum ópolitiskum, verkligum fyritreytum.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 94/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 21-0 atkvøðum.

1. juni 1995 legði rættarnevndin fram soljóðandi

Nú vit fáa nýggja stýrisskipan frá ólavsøku í ár, har høvuðsdenturin er lagdur á, at avgerð og ábyrgd skulu fylgjast. Sum núgaldandi lóg fyri landbúnaðarmál er, hevur Føroya Jarðarráð fullan avgerðarrætt í flest øllum landbúnaðarøkjum, uttan at

landsstýrið, sum kemur at fáa politisku ábyrgdina eftir nýggju lógini, hevur nakrar sum helst møgulcikar at ávirka avgerðirnar hjá Jarðarráðnum.

Tí má øll lóggávan hjá landbúnaðinum endurskoðast við tí fyri eyga, at ábyrgdin av avgerðum kann ávísast, mótvegis Føroya Løgtingi.

Tí verður sett fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður Føroya Landsstýri beinanvegin at fara undir at tillaga alla landbúnaðarlóggávuna soleiðis, at hon lýkur treytirnar í stýrisskipannarlógini um avgerð og ábyrgd, og at leggja uppskot fyri løgtingið áðrenn 1. januar 1996.

Fyriliggjandi løgtingsmál er ein royndi at fremja omanfyrinevndu tillaging, men eisini er ein prinsipiel broyting gjørd.

Tá nú øll lóggávan kortini skal endurskoðast, er tað skeivt at broyta samansetingina av jarðarráðnum nú, men eigur broytingin heldur at verða framd í samband við at landbúnaðaralóggávan skal endurskoðast í síni heild

Tí verður skotið upp at framleingja núverandi lóggávu fyribils.

Tá lógarøkið innan landbúnaðin er sera umfatandi og fløkt, og tá tað snýr seg um bæði føroyska og danska lóggávu, tekur tað nakað av tíð at fáa framt broytingarnar. Tó eignr ein freist at verða ásett av løgtinginum, soleiðis at lógirnar eru viðtiknar av løgtinginum og lýstar áðrenn ólavsøku 1996, tá landsstýrismannaábyrgdin mótvegis løgtinginum er komin í gildi.

Út frá hesum setir rættarnevndin fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð

Í uppskoti landsstýrisins verður § 8 orðað soleiðis:

I landsstyrets forslag affattes § 8 således: "I lagtingslov nr. 59 af 9. juni 1988 om landsjord, som ændret ved lagtingslov nr.

"Í løgtingslóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð, sum broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 8. mai 1991 verður § 3 orðað soleiðis:

1) "§ 3. Í Jarðarráðnum eru 5 limir, sum verða valdir av landsstýrinum.
   2. stk. Starvstíðin er 4 ár.
   3. stk. Fyri hvønn limin verður tiltakslimur valdur eftir reglunum í 1. stk.
   4. stk. Ráðið skipar seg sjálvt."
2) Sum nýggj § 18. stk. 3, verður sett: "Henda lóg fer úr gildi 1. apríl 1996.""

49 af 8. maj 1991 affattes § 3 således:

1) "§ 3. Landbrugsrådet har 5 medlemmer, der vælges af landsstyret.
   Stk. 2. Funktionsperioden er 4 år.
   Stk. 3. For hvert medlem vælges der suppleant efter reglerne i stk. 1.
   Stk. 4. Rådet konstituerer sig selv."
2) Som ny § 18, stk. 3, indsættes: "Denne lov ophæves 1. april 1996.""

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskot landsstýrisins við broyting til § 8 frá rættarnevndini endaliga samtykt við 300-0 atkvøðum. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 30-0 atkvøðum.

Lóg nr. 110 frá 29. juni 1995.

FL jnr. 105-7/95.

134 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Fiskiveiðu- og sjóvinnumál)

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Fiskiveiðu- og sjóvinnumál).

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 57 frá 5. juni 1984 um hvalaveiðu verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3 ganga út orðini "saman við fiskivinnunevnd løgtingsins".
2) Í § 4, stk. 2 ganga út orðini "saman við fiskivinnunevnd løgtingsins".
3) § 5, stk. 1, 2. pkt. verður strikað.
4) Í § 5, stk. 3 ganga út orðini "í samráð við løgtingsins marknaðarnevnd".

§ 2.

Í løgtingslóg nr. 41 frá 20. mai 1988 um lán/serlán til fiskifør verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 ganga út orðini "saman við fíggjarnevndini".
2) § 3, stk. 2 verður strikað.

§ 3.

Løgtingslóg nr. 97 frá 18. november 1991 um japanska fiskiveiðu undir Føroyum verður avtikin.

§ 4.

Í løgtingslóg nr. 29 frá 23. februar 1993 um almenna uppboðssølu av fiski verður § 1, stk. 2, 2. pkt. strikað.

lagtingslov om ændring af forskellige lagtingslove i forbindelse med at styrelsesordningsloven træder i kraft. (Fiskeri- og søfartsanliggender).

§ 1.

I lagtingslov nr. 57 af 5. juni 1984 om hvalfangst foretages følgende ændringer:

1) I § 3 udgår ordene "sammen med lagtingets fiskeriudvalg".
2) I § 4, stk. 2 udgår ordene "sammen med lagtingets fiskeriudvalg".
3) § 5, stk. 1, 2. pkt. udgår.
4) I § 5, stk. 3 udgår ordene "efter samråd med lagtingets markedsudvalg".

§ 2.

I lagtingslov nr. 41 af 20. maj 1988 om lån/særlån til fiskefartøjer foretages følgende ændringer:

1) I § 1 udgår ordene "sammen med finansudvalget".
2) § 3, stk. 2 ophæves.

§ 3.

Lagtingslov nr. 97 af 18. november 1991 om japansk fiskeri ved Færøerne ophæves.

§ 4.

I lagtingslov nr. 29 af 23. februar 1993 om offentligt auktion for fisk udgår § 1, stk. 2, 2. pkt.

§ 5.

Í løgtingslóg nr. 34 frá 4. mars 1993 um stuðul til feskfiskaflotan verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, stk. 4 verða orðini ", ið krevur góðkenning af fiskivinnunevnd løgtingsins," strikað.
2) Í § 6, stk. 1 verða orðini "saman við løgtingsins fíggjarnevnd" strikað.
3) Í § 7 verða orðini "saman við løgtingsins fíggjarnevnd" strikað.

§ 6.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum broytt við løgtingslóg nr. 105 frá 24. august 1994 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 9, stk. 2 verða orðini "saman við løgtingsins fiskivinnunevnd" strikað.
2) Í § 22, stk. 1 verða orðini "Løgtingið ásetir" strikað og í staðin verður sett: "Við løgtingslóg verða ásettar".
3) § 22, stk. 2 verður orðað soleiðis:
   "**Stk. 2.** Landsstýrið leggur uppskot fram til løgtingslóg sbrt. stk. 1, 1. pkt. og gevur í viðmerkingunum til uppskotið frágreiðing við øllum upplýsingum av týdningi viðvíkjandi ásetingini av mest loyvdu veiðu og heildarkvotum."

§ 7.

Í løgtingslóg nr. 67 frá 9. juni 1988 um mynstring verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 5, stk. 1 og stk. 2 verða orðini "saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins" strikað.
2) Í § 6, stk. 1 verða orðini "saman við Løgtingsins Fiskivinnunevnd" strikað.

§ 8.

Henda løgtingslóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

§ 5.

I lagtingslov nr. 34 af 4. mars 1993 om støtte til ferskfiskeriflåden foretages følgende ændringer:

1) I § 3, stk. 4 udgår ordene ", der skal have godkendelse af lagtingets fiskeriudvalg,".
2) I § 6, stk. 2 udgår ordene "til sammen med lagtingets finansudvalg".
3) I § 7 udgår ordene "sammen med lagtingets finansudvalg".

§ 6.

I lagtingslov nr. 28 af 10. marts 1994 om erhvervsmæssigt fiskeri, som ændret ved lagtingslov nr. 105 af 24. august 1994 foretages følgende ændringer:

1) I § 9, stk. 2 udgår ordene "sammen med lagtingets fiskeriudvalg".
2) I § 22, stk. 1 udgår ordene "Lagtinget fastsætter" og i stedet indsættes: "Ved lagtingslov fastsættes".
3) § 22, stk. 2 affattes således:
   "**Stk. 2.** Landsstyret fremlægger forslag til lagtingslov i henhold til stk. 1, 1. pkt. og giver i bemærkningerne til forslaget en redegørelse med alle oplysninger af betydning vedrørende fastsættelsen af højst tilladte fangst og totalkvote."

§ 7.

I lagtingslov nr. 67 af 9. juni 1988 om mønstring af søfarende foretages følgende ændringer:

1) I § 5, stk. 1 og stk. 2 udgår ordene "i samråd med lagtingets fiskeriudvalg".
2) I § 6, stk. 1 udgår ordene "i samråd med lagtingets fiskeriudvalg".

§ 8.

Denne lagtingslov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Løgtingið álegði landsstýrinum við løgtingssamtykt 28.06.1994 at leggja fyri løgtingið innan 1. januar 1995:
- Uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið,
- uppskot til løgtingslóg, og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnir til ríkislóg, sum leggur allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið,
- uppskot til løgtingslóg og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnir til ríkislóg, sum tekur av fyrisitingarligan myndugleika hjá nevndum, stýrum og ráðum og leggur hann til landsstýrið í teim førum, tá ið nevndin, stýrið ella ráðið ikki umboðar serligan yrkiskunnleika ella serlig áhugamál, men bert vanlig politisk áhugamál,
- uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna soleiðis, at hon verður lagað til samtykta stýrisskipanarlógaruppskotið.

Samsvarandi hesi samtykt er uppskotið, sum nú verður lagt fram, gjørt, har allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum verða avtiknar og heimildir løgtingsins at velja nevndar- ella stýrislimir verða lagdar landsstýrinum.

Viðmerkingar til einstakar greinir:

ad § 3: Henda lóg er óneyðug. Heimildin er nú at finna í § 23 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap.

1. viðgerð 24. april 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 21-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram ískoytisálit.

Sí ískoytisálit í tingmáli 103/1994.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 92 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 105-7/95.

135 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Handilsmál)

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Handilsmál).

§ 1.

Løgtingslóg nr. 10 frá 6. mars 1951 um tilskotsrindan til neyðsynjarvørur verður avtikin.

§ 2.

Í løgtingslóg nr. 25 frá 13. mars 1992 um príseftirlit verður í § 16, stk. 2 orðið "løgtinginum" strikað og í staðin sett: "landsstýrinum".

§ 3.

Henda løgtingslóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

Stk. 2. Nýval av øllum nevndum, sum nevndar verða í hesi løgtingslóg fer fram aftaná at lógin hevur fingið gildi og í seinasta lagi 1. oktober 1995. Hesar nevndir verða heretir valdar sbrt. ásetingum lógarinnar ella sbrt. siðvenju.

lagtingslov om ændring af forskellige lagtingslove i forbindelse med at styrelsesordningsloven træder i kraft. (Handelsområdet).

§ 1.

Lagtingslov nr. 10 af 6. marts 1951 om ydelse af tilskud til nødvendighedsvarer ophæves.

§ 2.

I lagtingslov nr. 25 af 13. marts 1992 om priskontrol udgår i § 16, stk. 2 ordet "lagtinget" og i stedet sættes: "landsstyret".

§ 3.

Denne lagtingslov træder i kraft olajdag 1995.

Stk. 2. Ekstraordinært valg af alle udvalg og nævn, der nævnes i denne lagtingslov, foretages efter lovens ikrafttræden og senest 1. oktober 1995. Disse nævn og udvalg udpeges herefter påny efter lovens bestemmelser eller i.h.t. sædvane.

Viðmerkingar:

Løgtingið álegði landsstýrinum við løgtingssamtykt 28. juni 1994 at leggja fyri løgtingið innan 1. januar 1995:

- Uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið.

- Uppskot til løgtingslóg og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnar til ríkislóg, sum leggur allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið.
- Uppskot til løgtingslóg og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnar til ríkislóg, sum tekur av fyrisitingarligan myndugleika hjá nevndum, stýrum og ráðum og leggur hann til landsstýrið í teim førum, tá ið nevndin, stýrið ella ráðið ikki umboðar serligan yrkiskunnleika ella serlig áhugamál, men bert vanlig politisk áhugamál.
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna soleiðis, at hon verður lagað til samtykta stýrisskipanarlógarupppskotið.

Samsvarandi hesi samtykt verður hetta uppskot, sum fevnir um handilsmál, har allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum verða avtiknar og heimildir løgtingsins at velja nevndar- ella stýrislimir verða lagdar landsstýrinum, lagt fyri løgtingið.

Viðmerkingar til einstakar greinir:

ad § 1: Løgtingslóg nr. 10 frá 6. mars 1951 er bundin at støðuni eftir seinna heimsbardaga. Hon er ikki nýtt í eitt mannaminni. Skotið verður tí upp at avtaka lógina, heldur enn bert at rætta hana eftir nýggju stýrisskipanarlógini.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 25-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram ískoytisálit.

Sí ískoytisálit í tingmáli 103/1994.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 78 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 105-7/95.

136 Broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Ídnaðar- og menningarmál)

Ár 1995, mikudagin 26. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi. (Ídnaðar- og menningarmál).

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1988 um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 95 frá 11. mai 1993, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verða orðini "í samráð við fíggjarnevnd løgtingsins" strikað.
2) Í § 5 verða í tveimum førum orðini "eftir góðkenning fíggjarnevndarinnar" strikað.

§ 2.

Í løgtingslóg nr. 102 frá 19. august 1988 um endurnýgging av fiskiskipaflotanum, sum einast broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 30. mai 1990, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2 verða orðini "við góðkenning frá fíggjarnevnd Føroya løgtings" strikað.
2) Í § 6, stk. 2 verða orðini "og fíggjarnevnd" strikað.
3) Í § 10, stk. 1 verða orðini "saman við fíggjarnevndini" strikað.

lagtingslov om ændring af forskellige lagtingslove i forbindelse med at styrelsesordningsloven træder i kraft. (Industri- og udviklingsområdet).

§ 1.

I lagtingslov nr. 38 af 20. maj 1988 om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport, som senest ændret ved lagtingslov nr. 95 af 11. maj 1993, foretages følgende ændringer:

1) I § 1 udgår ordene "efter forhandling med Lagtingets finansudvalg".
2) I § 5 udgår i to tilfælde ordene "efter godkendelse fra finansudvalget".

§ 2.

I lagtingslov nr. 102 af 19. august 1988 om fornyelse af fiskeflåden, som senest ændret ved lagtingslov nr. 61 af 30. maj 1990, foretages følgende ændringer:

1) I § 2 udgår ordene "med finansudvalgets godkendelse".
2) I § 6, stk. 2 udgår ordene "og lagtingets finansudvalg".
3) I § 10, stk. 1 udgår ordene "efter forhandling med finansudvalget".
4) I § 11, stk. 1 udgår ordene "efter

4) Í § 11, stk. 1 verða orðini "í samráð við fíggjarnevndina" strikað.
5) Í § 11, stk. 2 verða orðini "eftir góðkenning fíggjarnevndarinnar" strikað.

forhandling med finansudvalget".
5) I § 11, stk. 2 udgår ordene "efter godkendelse af finansudvalget".

§ 3.

Í løgtingslóg nr. 83 frá 19. juni 1990 um stuðul til bygging av farmaskipum, sum broytt við løgtingslóg nr. 94 frá 11. mai 1993 verður gjørd tann broyting, at í § 5 verða orðini "saman við fíggjarnevndini" strikað.

§ 3.

I lagtingslov nr. 83 af 19. juni 1990 om støtte til bygning af fragtskibe, som ændret ved lagtingslov nr. 94 af 11. maj 1993 foretages den ændring, at i § 5 udgår ordene "i samråd med finansudvalget".

§ 4.

Í løgtingslóg nr. 57 frá 8. mai 1991 um sáttmálaveðhaldsgrunn fyri føroyskar skipasmiðjur verður § 1, stk. 4 strikað.

§ 4.

I lagtingslov nr. 57 af 8. maj 1991 om kongraktgarantifond for færøske skibsværfter ophæves § 1, stk. 4.

§ 5.

Í fíggjarløgtingslógini fyri árið 1. januar - 31. desember 1995 nr. 127 frá 22. desember 1994 verður gjørd hetta broyting:
Í § 18 viðm. 18532 ganga út orðini "eftir góðkenning av løgtingsins fíggjarnevnd".

§ 5.

Finanslagtingsloven for året 1. januar - 31. december 1995 nr. 127 af 22. december 1994, (ændring i den færøske tekst).

§ 6.

Henda løgtingslóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

§ 6.

Denne lagtingslov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Løgtingið álegði landsstýrinum við løgtingssamtykt 28.06.1994 at leggja fyri løgtingið innan 1. januar 1995:
- Uppskot til løgtingslóg, sum tekur av allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið,
- uppskot til løgtingslóg, og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnir til ríkislóg, sum leggur allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið,
- uppskot til løgtingslóg og uppskot til tilmæli til ríkismyndugleikarnir til ríkislóg, sum tekur av fyrisitingarligan myndugleika hjá nevndum, stýrum og ráðum og leggur hann til landsstýrið í teim førum, tá ið nevndin, stýrið ella ráðið ikki umboðar serligan yrkiskunnleika ella serlig áhugamál, men bert vanlig politisk áhugamál,

- uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna soleiðis, at hon verður lagað til samtykta stýrisskipanarlógaruppskotið.

Samsvarandi hesi samtykt er uppskotið, sum nú verður lagt fram, gjørt, har allar fyrisitingarligar heimildir hjá løgtingsnevndum verða avtiknar og heimildir løgtingsins at velja nevndar- ella stýrislimir verða lagdar landsstýrinum.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram ískoytisálit.

Sí ískoytisálit í tingmáli 103/1994.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 83 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 106-7/95.

137 Avtøka av løgtingslóg um keyp av húsaognum

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um keyp av húsaognum.

§ 1.
Løgtingslóg nr. 31 frá 30. apríl 1987 um keyp av húsaognum verður avtikin.

§ 2.
Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om køb af husejendomme.

§ 1.
Lagtingslov nr. 31 af 30. april 1987 om køb af husejendomme ophæves.

§ 2.
Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:
Lógin varð upprunaliga samtykt við tí fyri eyga at keypa landslæknahúsini og tvey onnur hús.

Lógin kann nú avtakast, tí verður talan um at keypa/byggja umsitingarbygningar, má neyðug játtan útvegasi á fíggjarlógini.

1. viðgerð 21. apríl 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 2. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð tann 21. apríl 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur **ein samd nevnd** undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 22. mai 1995. Uppskotið samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð 29. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 75 frá 13. juni 1995.

138 Løgtingslóg um lántøku til landskassan og umfígging av landskassaskuld

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um lántøku til landskassan og umfígging av landskassaskuld.

§ 1. Landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað at taka lán svarandi til 120 mió. kr. til hall landskassans í 1995 v.m.

§ 2. Landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað við láni at endurfíggja útgjaldingar av bundnari uppsparing og útgjalding av fløgugrunnum.

§ 3. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kuungjørd.

lagtingslov om optagelse af lån til landskassen og refinansiering af landskassens gæld.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån svarende til 120 mio. kr. til landskassens underskud i 1995 m.m.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne med lån at refinansiere udbetalinger af bunden opsparing og udbetalinger af investeringsfonde.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter, den er kundgjort.

Viðmerkingar:

Við framlagda uppskotinum verður søkt um heimild at økja skuld landskassans við 120 mió. kr. og at umfíggja 116 mió. kr.

Landsstýrið hevur sambært løgtingslóg nr. 116 frá 20. desembur 1991 heimild at taka upp lán til endurfígging av verandi lánum. Landsstýrið hevur sostatt altíð heimild til at gjalda avdráttir og útgjalda lán við upptøku av nýggjum lánum. Hinvegin skal landsstýrið altíð útvega sær heimild frá løgtinginum, um landsstýrið við eini lántøku økir um samlaðu skuld landskassans.

Í framlagda uppskotinum verður søkt um heimild til lánsupptøku í tveimum. Í fyrsta lagi verður søkt um heimild at fíggja hallið á fíggjarlógini 1995 v.m. Í øðrum lagi verður søkt um loyvi at umfíggja skuld, nevniliga bundnu uppsparingina og fløgugrunnarnar hjá virkjum.

Í fyrsta lagi verður sostatt søkt um heimild at økja skuld landskassans við hallinum á

fíggjarlógini 209 mió. kr. Harumframt verður søkt um heimild at taka upp lán at læna útaftur til ymisk endamál. (Sí hjálagda skjal). Heimildin verður síðan minkað við ymsum gjaldførisbroytingum, serliga tí allar tær rentur, ið verða tilskrivaðar í 1995, ikki falla til gjaldingar fyrr enn í 1996.

Nakað av virkseminum á fíggjarlógini hevur landsstýrið áður útvegað sær heimild til. Tað er t.d. útlán til Framtaksgrunnin, keyp og umbygging av forngripasavni og maskinskúla. Tí verða hesar lántøkuheimildir mótroknaðar í uppskotinum til lántøkuheimild.

Í øðrum lagi verður søkt um heimild at umfíggja skuld.

Sum áður nevnt hevur landsstýrið sambært løgtingslóg nr. 116 frá 20. desembur 1991 altíð heimild at umfíggja lán. Bundna uppsparingin kann metast sum eitt ella fleiri lán frá skattaborgarunum, og íløgugrunnarnir kunnu metast sum lán frá ymsum vinnufyritøkum. Av tí at ikki er talan um formliga undirskrivað lánsskjøl, hevur landsstýrið valt at søkja um heimild at umfíggja hesa skuld, nú bundna uppsparingin og íløgugrunnarnir skulu útgjaldast.

1. viðgerð 20. apríl 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. apríl 1995 og varð undir 1. viðgerð 20. apríl 1995 beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariassen, Kristian Magnussen og Tordur J. Niclasen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Finnbogi Ísakson) tekur undir við greinunum 1 og 3.

Ein annar minniluti (Anfinn Kallsberg) tekur ikki undir við uppskotinum, men mælir til, at øll okkara fíggjarligu og politisku viðurskifti við Danmark verða tikin upp til nýggja viðgerð.

Minnilutin hevur áður víst á tað skaðiliga fyri okkara búskap, at vit fíggja framhaldandi undirskot á fíggjarlógini og endurfíggja almenn lán við at útskriva lánsbrøv við hægri rentu, sum uppá longri sikt kemur at viðføra, at rentustøðið í Føroyum kemur at hækka munandi, til óbótaligan skaða fyri alt samfelagið, bæði tað privata og tað vinnuliga.

Eftir at fleiri og fleiri avdúkingar koma fram, sum undirbyggja, at danska stjórnin hevur eina ætlan fyri hvussu gongdin í Føroyum skal verða, og at hesar ætlanir eru drepandi

fyri tað føroyska samfelagið, eiga vit at siga upp allar gjørdar avtalur við donsku stjórnina, og taka upp samráðingar út frá hvat tænir føroyingum og Føroyum best.

Minnilutin setir tí í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at siga upp avtalurnar við donsku stjórnina frá 6. okt. 1992 og eftirfylgjandi avtalur, og biður um samráðingar av nýggjum við donsku stjórnina, um eina fíggjarliga og politiska skipan í staðin.

2. viðgerð 19. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Við atkvøðugreiðsluna 22. mai 1995 varð uppskotið samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskot minnilutans til samtyktar fall við 11-0 atkvøðum.

3. viðgerð 29. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

Lóg nr. 96 frá 13. juni 1995.

139 Broyting í løgtingslóg um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovnar

Ár 1995, týsdagin 18. apríl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovnar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 15 frá 10. februar 1984 um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovnar, sum broytt við løgtingslóg nr. 22 frá 22. apríl 1988 verður gjørd henda broyting:

Í § 3 ganga út orðini "við góðkenning fíggjarnevndarinnar".

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om refinansiering af lån til landskassen og landsinstitutioner.

§ 1.

I lagtingslov nr. 15 af 10. februar 1984 om refinansiering af lån til landskassen og landsinstitutioner, som ændret ved lagtingslov nr. 22 af 22. april 1988 foretages følgende ændring:

I § 3 udgår ordene "efter godkendelse af finansudvalget".

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Sambært løgtingslóg nr. 116 frá 20. desember 1991 hevur landsstýrið standandi heimild at taka upp lán til endurfígging av longu upptiknum lánum. Landsstýrið hevur sostatt til eina og hvørja tíð heimild at taka upp lán at gjalda avdráttir við. Er hinvegin ætlanin at økja um samlaðu skuld landskassans, má landsstýrið útvega sær heimild til hetta við løgtingslóg.

Í løgtingslóg nr. 15 frá 10. februar 1984 um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovnar verður heimilað ymsum landsstovnum at endurfíggja lán.

Somuleiðis verður heimilað landsstýrinum (í § 3) at veðhalda, tá landsstovnar taka lán at fíggja avdráttargjaldingar av verandi lánum.

Lógin verður sambært uppskotinum broytt soleiðis, at landsstýrið einsamalt hevur heimild at veðhalda fyri lánum hjá ymsum landsstovnum, meðan tað eftir verandi lóg er neyðugt, at fíggjarnevndin góðkennir tílík veðhald.

1. viðgerð 20. apríl 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 20. apríl 1995 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariassen, Kristian Magnussen, Finnnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Meirilutin hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at broyta løgtingslóg nr. 15 frá 10. februar 1984. Løgtingslógin er áður broytt við løgtingslóg nr. 22 frá 22. apríl 1988. Galdandi lóg heimilar landsstýrinum landskassans vegna at taka upp lán til endurfígging av verandi lánum. Lógin heimilar eisini Telefonverkinum, Føroya Jarðarráð, Húsalánsgrunninum, Føroya Ídnaðargrunni og Menningargrunni Ídnaðarins at endurfíggja verandi lán. Heimildin røkkur ikki longur enn til upptøku av nýggjum lánum svarandi til upphæddina av gomlum lánum, tikin við landskassaveðhaldi. Sambært grein 3 í lógini verður landsstýrið - við góðkenning fíggjarnevndarinnar - heimilað at veðhalda fyri upptøku av lánum til nevndu stovnar.

Tað er góðkenning fíggjarnevndarinnar, sum sambært nýggja lógaruppskotinum nú fellur burtur. Undir viðgerðini hevur fíggjarnevndin havt fund við Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í fíggjarmálum, Kára Petersen, fíggjarstjóra og Sjúrð Rasmussen, adv.

Sjúrður Rasmussen vísti á, at uppskotnu broytingar eru í tráð við nýggju stýrisskipannarlógina. Fíggjarnevndin kann ikki ábyrgjast fyri sínar gerðir, og tí eigur heimildin at liggja hjá avvarðandi landsstýrismanni. Fíggjarnevndin førdi fram, at lógaruppskotið hevur við sær, at tingið ikki fær tryggjað sær, at tikin lán verða niðurgoldin í samsvar við upprunaætlan. Eftir nýggja uppskotinum kann landsstýrið áhaldandi góðkenna 100% endurfíggingar, t.v.s. uttan niðurgjalding, hóast hetta ikki hevur verið ætlan tingsins.

Sjúrður Rasmussen segði, at um tingið framvegis ynskti at stýra gongdini, var ein annar møguleiki at avtaka galdandi heimildarlóg.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vísti á, at umfígging sum oftast kom uppá tal í sambandi við at møguleiki var fyri at fáa eina betri fígging, t.d. eina lægri rentu. Hann helt, at mannagongdin gjørdist alt ov stirvin, um landsstýrið skuldi niðan í tingið hvørja ferð møguleiki var fyri umfígging. Hann helt galdandi lóg, sum krevur samtykki fíggjarnevndarinnar, vera betri enn eina avtøku av lógini, sum førir við sær, at neyðugt

verður at fara í tingið hvørja ferð.

Við hesum viðmerkingum, mælir meirilutin at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) førir fram:

Nú vit fáa nýggja stýrisskipan og landsstýrismanna ábyrgd av sínum málsøki um eitt gott ár, verða fleiri viðurskifti í galdandi lógum, sum mugu tillagast hesum broyttu viðurskiftunum.

Fyriliggjandi uppskot gongur út uppá at geva landsstýrinum heimild at upptaka nýggj lán samsvarandi upphæddirnar av gomlum lánum, tikin við landskassaveðhaldi.

Minnilutin heldur tað vera óheppið, at ein stovnur sum hevur fingið eina nettoupphædd setta á fíggjarlógina, kann fáa tilførdan pening til nýtslu og íløgur uttan at hetta er positivt samtykt á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Á fundi 15. mai 1995 millum umsitingina, landsstýrið og fíggjarnevndina vóru partarnir samdir um, at hjá teimum stovnum, sum eisini hava eina inntøku, skulu bæði inntøkur og útreiðslur framganga av fíggjarlógini, soleiðis at fíggjarlógin avspeglar virksemið í samfelagnum.

Minnilutin heldur tað tí vera sera óheppið at geva landsstýrinum heimildir, áðrenn fíggjarviðurskiftini eru í lagi, soleiðis at virksemi, sum ikki er avspeglað á fíggjarlógini, kann fara fram.

Út frá hesum mælir minnilutin til at avtaka lógina og setir tí fram soljóðandi

u p p s k o t

til

Løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovnar.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 15 frá 10. februar 1984 um endurfígging av lánum til landskassan og landsstovnar og løgtingslóg nr. 22 frá 22. apríl 1988 verða avtiknar.

§ 2.

Henda lóg fær gildi 29. juli 1995.

lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om refinansiering af lån til landskassen og landsinstitutioner.

§ 1.

Lagtingslov nr. 15 af 10. februar 1984 om refinansiering af lån til landskassen og landsinstitutioner samt lagtingslov nr. 22 af 22. april 1988 ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 29. juli 1995.

2. viðgerð 24. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Við atkvøðugreiðsluna 26. mai 1995 varð uppskotið samtykt við 24-0 atkvøðum. Broytingaruppskot minnilutans fall við 6-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

Lóg nr. 66 frá 13. juni 1995.

140 Felagslýsingin millum landsstýrið og stjórnina

Ár 1995, hósdagin 20. april legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur "Fælleserklæring fra møde den 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre" til umrøðu.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 60/1994 hevur løgtingið samtykt uppskot frá Miðflokkinum um, at álagt verður landsstýrinum at greiða nærri frá felagslýsingini millum stjórnina og landsstýrið frá 17. november 1994.

Við løgtingsmáli nr. 27/1994: Heildarveitingin til Føroyar, fylgdi eintak av felagslýsingini millum landsstýrið og stjórnina og var ætlan landsstýrisins, at felagslýsingin skuldi takast til umrøðu saman við málinum um blokkstuðulsveitingina, men varð hetta av einari ella aðrari orsøk av ongum.

Felagslýsingin verður sostatt við hesum løgd fyri løgtingið til umrøðu og verður tá høvi til hjá tingmonnum at fáa tær upplýsingar teir ynskja.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 20. apríl 1995 og varð eftir 1. viðgerð 2. mai 1995 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið, har landsstýrið leggur "Fælleserklæring fra møde den 17. november 1994 mellem regeringen og Færøernes landsstyre" fyri løgtingið til umrøðu.

Hetta løgtingsmál hevur sín uppruna í løgtingssamtyktini í løgtingsmáli nr. 60, tá løgtingið samtykti, at áleggja landsstýrinum at greiða løgtinginum nærri frá felagslýsingini av tí, at felagslýsingin av ymsum orsøkum ongantíð fekk veruliga viðgerð í løgtinginum. Marknaðarnevndin metir ikki, at landsstýrið við hesum løgtingsmáli beinleiðis hevur fylgt løgtingssamtyktini, men tekur til eftirtektar, at løgtingið nú hevur fingið høvi til at viðgera felagslýsingina millum landsstýrið og donsku stjórnina frá 17. november 1994 sum sjálvstøðugt mál, og at fáa spurningar svaraðar undir nevndarviðgerðini.

Tó metir marknaðarnevndin ikki, at tað gevur nakra meining, at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum, soleiðis sum tað er orðað. Verður uppskot landsstýrisins samtykt, merkir tað, at løgtingið enn einaferð tekur felagslýsingina til umrøðu. Hesum er tíðin farin frá.

Landsstýrið hevur ført fram, at tað ikki bant løgtingið á nakran hátt við hesari felagslýsing, og at henni tí ikki nýttist at samtykkjast á tingi og ikki hevði sjálvstøðuga viðgerð fyri neyðini.

Marknaðarnevndin førir fram, at gongdin í hesum máli vísir, at best er um landsstyrið kortini leggur týdningarmiklar avtalur, ið Føroyar gera við onnur lond fyri løgtingið til viðgerðar og møguliga samtyktar. Marknaðarnevndin hevur ikki viðgjørt, í hvønn mun hetta sjónarmið er í andsøgn við nýggju stýrisskipannarlógina, men heitir á landsstýrið at kanna hvussu nýggja stýrisskipannarlógin skal skiljast og tulkast í hesum føri.

Ein samd nevnd tekur við hesum viðmerkingum ikki undir við uppskotinum til samtyktar.

31. mai 1995 legði marknaðarnevndin fram soljóðandi

Álit II

Ein meirluti (Helena Dam á Neystabø, Jógvan Adolf Johannessen, Jákup Lamhauge og Ingeborg Vinther) setir fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Mælt verður løgtinginum til at taka Felagslýsingina millum landsstýrið og stjórnina frá 17. november 1994 til eftirtektar.

Minnilutin (Bjarni Djurholm, Jógvan Durhuus og Jenis av Rana) tekur ikki undir við Felagslýsingini millum landsstýrið og stjórnina frá 17. november 1994, men vilja kenna støðu løgtingsins til hetta avgerandi mál og seta fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur undir við Felagslýsingini millum landsstýrið og stjórnina frá 17. november 1994.

2. viðgerð 1. juni 1995. Finnbogi Ísakson, løgtingsmaður, setti fram uppskot um at beina málið aftur í marknaðarnevndina, uppskotið fall við 13-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins fall við 1-0 atkvøðu. Uppskot meirilutans í marknaðarnevndini til samtyktar samtykt við 18-0 atkvøðum.

141 Broytingar í tryggingaravtalulógini

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at fylgjandi ríkislógir um broytingar í tryggingaravtalulógini verða settar í gildi í Føroyum:

1) Lóg nr. 50 frá 24. februar 1960 "om ændringer i forsikringsaftalaloven",
2) lóg nr. 179 frá 24. mai 1972 "om ændring i lov om forsikringsaftaler",
3) § 2 í lóg nr. 212 frá 26. apríl 1973 "om ændring af købeloven, forsikringsaftaleloven og gældsbrevloven",
4) § 2 í lóg nr. 618 frá 19. desember 1984 "om ændring af lov om renter ved forsinket betaling, forsikringsaftaleloven m.v."
5) § 3 í lóg nr. 826 frá 18. desember 1991 "om ophævelse af lov om tilsyn med begravelseskasser og ligbrændingsforeninger og om ændring af forskellige lovbestemmelser" og
6) § 2 í lóg nr. 262 frá 6. mai 1993 "om ændring af lov om visse forbrugeraftaler og lov om forsikringsaftaler".

Viðmerkingar:

Meðan lógarøkið um tryggingarvirksemi er yvirtikið sum føroyskt sermál, er avtalurætturin og herundir avtalur um tryggingar eitt ríkismál.

Galdandi lóg í Føroyum á hesum øki er ríkislóg nr. 129 frá 15. apríl 1930 við 3 seinni broytingum.

Í avtalum við sjómina hevur landsstýrið bundið seg til at dagføra tryggingarlóggávuna. Nýggj lóg um tryggingarvirksemi verður framløgd í øðrum tingmáli.

Viðmerkingar til tær einstøku lógarbroytingarnar:

1) <u>Lóg nr.- 50/1960</u>
   Henda lógarbroyting stendst av, at tryggingaravtalulógin verður sett í gildi í Grønlandi. Eftir broytingarlógini verða freistir, ið eru longri enn vanligt, ásettar, um tryggingartakarin býr í Grønlandi.

2) <u>Lóg nr. 179/1972</u>
   Í hesin lógarbroyting verður ásett, at tær longru freistirnar, ið galdandi eru um

tryggingartakarin er búsettur í Grønlandi, ikki eru galdandi fyri sjópantikrøv.

3) Lóg nr. 212/1973
Eftir hesi lógarbroyting verða rentusatsirnir fyri ov seint goldið endurgjald ella tryggingargjald broyttir og knýttur at diskonto Tjóðbankans (diskontoin + 2 %)

4) Lóg nr. 618/1984
Eftir hesi lógarbroyting verður rentusatsurin aftur broyttur og settur at vera diskontoin hjá Tjóðbankanum + 5 %. Framéftir kann rentan broytast eftir avtalu við búskaparmálaráðið.

5) Lóg nr. 826/1991
Eftir hesi lógarbroyting fevnir tryggingaravtalulógin ikki longur um jarðarferðarkassar.

6) Lóg nr. 262/1993
Eftir lógarbroytingini kunnu tryggingartakarar siga seg leysar av eini tryggingaravtalu, um teir innan 14 dagar boða frá, at teir angra gjørdu avtaluna.

Hetta uppskot var eisini lagt fyri Løgtingið í seinasta tingsetu, men ikki avgreitt áðrenn nýval varð útskrivað.

1. viðgerð 26. apríl 1995. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l j t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð tann 26. apríl 1995 beint í ídnaðarnevndina.

Ídnaðarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur **ein samd nevnd** undir málinum.

2. viðgerð 22. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

142 Tryggingarlóggávan

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um tryggingarvirksemi

Løgtingið samtykkir viðlagda uppskot til løgtingslóg um tryggingarvirksemi (skjal A).

Viðmerkingar:

Landsstýrið setti í 1986 eina nevnd at kanna føroysku tryggingarlóggávuna og tryggingarviðurskiftini.

Í oktober 1989 sendi nevndin landsstýrinum eitt ávegis álit og vísti á 4 møguleikar at velja ímillum viðvíkjandi broyting í tryggingarøkinum.

Møguleikarnir, ið víst varð á, vóru hesir:

Møguleiki I:	Frí kapping millum føroysk skrásett feløg við føroyskum kapitali.
Møguleiki II:	Frí kapping millum núverandi tryggingardeildir í sambandinum.
Møguleiki III:	Núverandi bygnaður heldur fram.
Møguleiki IV:	Samanlegging av samtakinum til ein stovn.

Landsstýrið heitti í skrívi dagfest 1. mars 1990 á nevndina um at fáa at vita, hvønn møguleika nevndin mælti til at velja.

Í skrívi dagfest 9. juli 1990 mælti nevndin til at velja møguleika I: Fría kapping millum føroysk skrásett feløg vlð føroyskum kapitali.

Í avtalum við ríkisstjórnina hevur landsstýrið bundið seg til at dagføra tryggingarlóggávuna og at leggja uppskot fyri Løgtingið innan árið 1994 var úti.

Uppskot um nýggja løgtingslóg um tryggingarvirksemi varð lagt fyri løgtingið í seinastu tingsetu, men ikki avgreitt áðrenn val varð útskrivað. Uppskotið er síðan dagført til nýggja framløgu av arbeiðsbólkinum til kannan av tryggingarlóggávuni.

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Tryggingarsambandinum Føroyar og deildunum í samtakinum og eru hesi ummæli hjáløgd.

Landsstýrið tekur undir við uppskotinum frá nevndini og leggur við hesum uppskotið

við tilhoyrandi viðmerkingum fyri tingið.

1. viðgerð 26. apríl 1995. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Landsstýrinum tann 20. apríl 1995.

Við 1. viðgerð tann 26. apríl 1995 varð málið beint í ídnaðarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fundir við umboð fyri Landsstýri, Tryggingingarsamband Føroya og Granuskoðaravirkið C.V. Weihe.

Nevndin heldur, at skotbráðið til at viðgera hetta sera stóra lógaruppskot er ov stutt.

Fyri at fáa høvi til at viðgerða lógaruppskoti nágreinliga ynskir nevndin tí meiri tíð til hetta arbeiði.

Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Ídnaðarnevndin virkar sum millumtingarnevnd og leggur álit fram í komandi ólavsøku tingsetu um tryggingarlóggávu.

2. viðgerð 30. mai 1995. Uppskot nevndarinnar samtykt við 25-0 atkvøðum.

143 Broytingar í tryggingarlóggávuni

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

I.

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 um trygging verða stk. 2, stk. 3 og stk. 4 í § 6 orðað soleiðis:

"**Stk. 2.** Í umboðsráðnum sita 7 limir, sum landsstýrið velur fyri 4 ár í senn.

Stk. 3. Í nevndini eru 5 limir. Av teimum velur umboðsráðið 1 og landsstýrið hinar.

Stk. 4. Landsstýrið velur tveir persónar at hava ta almennu umsjónina við samtakinum. Útreiðslurnar av umsjónini falla á samtakið."

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

Stk. 2. Nýval av nevndum eftir hesi løgtingslóg fer fram aftaná, at lógin hevur fingið gildi og í seinasta lagi 1. oktober 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om forsikring.

§ 1.

I lagtingslov nr. 24 af 28. marts 1956 om forsikring affattes stk. 2, stk. 3 og stk. 4 i § 6 således:

"**Stk. 2.** Repræsentantskabet består af 7 medlemmer, der vælges af landsstyret for 4 år.

Stk. 3. Bestyrelsen består af 5 medlemmer, hvoraf repræsentantskabet vælger 1 og landsstyret de andre.

Stk. 4. Det offentlige tilsyn med forbundet føres af to af landsstyret udpegede personer. Udgifterne ved tilsynet afholdes af forbundet."

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Stk. 2. Ekstraordinært valg af nævn efter denne lagtingslov foretages efter lovens ikrafttræden og senest 1. oktober 1995.

II.

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lívstryggingarvirksemi.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 64 frá 10. oktober 1966 um lívstryggingarvirksemi við seinni broytingum verður § 4, stk. 2 orðað soleiðis:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om livsforsikringsvirksomhed.

§ 1.

I lagtingslov nr. 64 af 10. oktober 1966 om livsforsikring med senere ændringer affattes § 4, stk. 2 således:

"**Stk. 2.** Det offentlige tilsyn med anstalten

"**Stk. 2.** Hitt almenna eftirlitið við stovninum liggur hjá tveimum persónum, ið landsstýrið velur. Útreiðslurnar av eftirlitinum verða goldnar av stovninum."

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

Stk. 2. Nýval av nevndum eftir hesi løgtingslóg fer fram aftaná, at lógin hevur fingið gildi og í seinasta lagi 1. oktober 1995.

føres af to af landsstyret udpegede personer. Udgifterne ved tilsynet afholdes af anstalten."

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Stk. 2. Ekstraordinært valg af nævn efter denne lagtingslov foretages efter lovens ikrafttræden og senest 1. oktober 1995.

Viðmerkingar:

Við løgtingssamtykt 22. juni 1994 álegði tingið landsstýrinum innan ólavsøku 1995 at leggja uppskot til løgtingslógir fyri løgtingið, sum avtaka fyrisiringarligar heimildir hjá løgtingsnevndum og leggur tær til landsstýrið.

Samsvarandi hesi samtykt verða frammanfyri standandi broytingar í ymsum tryggingarlógum lagdar fyri tingið.

1. viðgerð 26. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram ískoytisálit.

Sí ískoytisálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 77 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 617-6/91.

144 Broyting í ávísum løgtingslógum innan kommunala økið í samband við at stýrisskipanarlógin fær gildi

Ár 1995, hósdagin 20. aprīl legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir og um avtøku av løgtingslóg um kommunalan lánigrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

§ 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Í býarskipanarnevndini sita 7 limir valdir soleiðis:

Landsstýrið velur 4 limir í nevndina, harímillum formannin, sum skal vera løgfrøðingur. 3 limir skulu vera byggikønir, harav Føroya Kommunufelag velur 2 og Tórshavnar kommuna 1."

§ 2.

Løgtingslóg nr. 75 frá 9. juni 1988 um kommunalan lánigrunn verður avtikin.

§ 3.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

Stk. 2. Nýval av býarskipanarnevndini eftir § 1 fer fram aftaná, at lógin hevur fingið gildi og í seinasta lagi 1. oktober 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om byplaner og byggevedtægter og om ophævelse af lagtingslov om kommunal lånefond.

§ 1.

I lagtingslov nr. 13 af 321. maj 1954 om byplaner og byggevedtægter foretages følgende ændring:

§ 2, stk. 1 affattes således:

"Byplannævnet har 7 medlemmer, der vælges således:

Landsstyret vælger 4 medlemmer, deriblandt formanden, der skal være jurist. 3 medlemmer skal være byggesagkyndige, hvoraf Færøernes Kommuneforening vælger 2 og Torshavn kommune 1."

§ 2.

Lagtingslov nr. 75 af 9. juni 1988 om kommunal lånefond ophæves.

§ 3.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Stk. 2. Ekstraordinært valg af byplannævnet efter § 1 foretages efter lovens ikrafttræden og senest 1. oktober 1995.

Viðmerkingar:

Broyting í býarskipanarlógini.

Býarskipanarnevndin er ráðgevandi hjá landsstýrinum í málum viðvíkjandi býarskipan og landsstýrið skal eftir býarskipanarlógini fáa tilmæli frá býarskipanarnevndini, áðrenn landsstýrið góðkennir býarskipanir og byggisamtyktir, sum kommunurnar hava gjørt og samtykt.

Einasta broyting í mun til galdandi reglur viðvíkjandi samanseting og vali av býarskipanarnevndini er, at í staðin fyri løgtingið skal landsstýrið velja formannin fyri nevndina.

Avtøka av Løgtingslógini um kommunalan lánigrunn.
Eftir lógini um kommunala lánigrunnin kann úr grunninum veitast lagalig lán til kommunur til m.a. at keypa byggilendi og til kloakering. Lógin kom í staðin fyri løgtingslóg nr. 38 frá 26. apríl 1974 um veitan av láni til kommunur til keyp av jørð.

At viðgera lániumsóknir og at gera tilmæli til landsstýrið um lánijáttanir skal eftir § 3 í lógini frá 1988 setast ein nevnd við 5 limum, harav løgtingið velur 2 og landsstýrið 3, harímillum formannin.

Ongar játtanir eru givnar eftir hesi lógini, men eftir lógini frá 1974 hava kommunurnar umleið 7 mió. kr. í lánum úr landskassanum, sum vera umsitin av gjaldstovuni.

Grunnurin varð avtikin við løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum. Løgtingslógin um kommunala lánigrunnin er tó ikki avtikin. Eingin nevnd er vald fyri grunnin, og eingin játtan hevur verið á løgtingsfíggjarlógini til endamálið tey seinastu árini. Við løgtingslógini um kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan láni- og veðhaldsgrunn o.a.m. eru møguleikar skaptir at veita kreppuraktum kommunum lagalig lán.

Landsstýrið heldur tí - eisini við atliti at støðu landskassans - at løgtingslógin nr. 75 frá 1988 um kommunala lánigrunnin eigur at verða avtikin.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram ískoytisálit.

Sí ískoytisálit í tingmáli 103/1994.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskot nevndarinnar til samtyktar samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 80 frá 13. juni 1995.

145 Broyting í lóg fyri Føroyar um stýri kirkjunnar

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at heitt verður á ríkisstjórnina um at fremja niðanfyri nevndu broytingar í lóg nr. 109 frá 29. mars 1924 "for Færøerne om Kirkernes Styrelse", sum broytt við lóg nr. 192 frá 11. mai 1935:

"I lov nr. 109 af 29. marts 1924 for Færøerne om Kirkernes Styrelse, som ændret ved lov nr. 192 af 11. maj 1935 foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 1, § 3, stk. 3 og § 7, stk. 2, 3 og 4, § 9, stk. 3 og § 11, stk. 3 ændres "lagtinget" til: "landsstyret".
2) § 2 affattes således:
   "**§ 2.** Menighedsrådet er kirkernes stedlige styrelse under tilsyn af en kirkeinspektion, som består af rigsombudsmanden, biskoppen og 3 af landsstyret for 4 år ad gangen valgte medlemmer.""

Viðmerkingar:

Vísandi til løgtingssamtyktina frá 22. juni 1994, har løgtingið í samband við nýggja stýrisskipanarlóg m.a. áleggur landsstýrinum at gera neyðugar lógarbroytingar, sum leggja allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið, verður við hesum lagt uppskot fyri løgtingið um at mæla ríkisstjórnini til at fremja omanfyri nevndu lógarbroytingar.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskot landsstýrisins I og II samtykt við 24-0 atkvøðum.

146 Broyting í lóg fyri Føroyar um dagpening vegna sjúku og barnsburð

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í lóg fyri Føroyar um dagpening vegna sjúku og barnsburð.

(reglur um at føroyingar, ið sigla við útlendskum skipi ella arbeiða fyribils uttanlands, koma undir dagpeningaskipanina).

§ 1.

Í lóg fyri Føroyar um dagpening vegna sjúku og barnsburð, jb. lógarkunngerð nr. 102 frá 2. mars 1988 við seinni broytingum verður í § 2, stk. 1 sum nýtt 3. pkt. sett:

"Fyri persónar, sum hava hýru við útlendskum skipi ella fyribils arbeiða uttanfyri Føroyar, men sum hava fastan bústað í Føroyum og eru heilt ella partvís skattskyldugir í Føroyum, verða hýra við útlendskum skipi og tilhald uttanlands javnt stillað við tilhald í Føroyum."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. juni 1995.

lagtingslov om ændring i lov for Færøerneom dagpenge ved sygdom og fødsel.

(regler om at færinger, som er med udenlandske skibe eller midlertidig arbejder udenfor Færøerne, omfattes af dagpengeordningen).

§ 1.

I lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel, jf. lovbekendtgørelse nr. 102 af 2. marts 1988 med senere ændringer indsættes i § 2, stk. 1, som nyt 3. pkt.:

"For personer, der er forhyret med udlandsk skib eller midlertidigt arbejder udenfor Færøerne, men som har fast bopæl på Færøerne og er helt eller delvis skattepligtige på Færøerne, sidestilles forhyring på udlandsk skib og opholdstid i udlandet også med ophold på Færøerne."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. juni 1995.

Viðmerkingar:

Ætlanin við hesi lógarbroyting, ið er eitt ískoyti til verandi dagpeningalóg, er at geva teimum føroyingum, sum sigla við útlendskum skipum ella sum arbeiða uttanlands í eitt styttri tíðarskeið, rætt til dagpening eftir føroysku dagpeningalógini.

Sum er, er treytin fyri at fáa dagpening eftir føroysku dagpeningalógini, at viðkomandi hevur uppihildið sær í Føroyum í 6 vikur frammanundan, at hann gjørdist sjúkur ella

kom til skaða.

Hetta hevur vísi seg at verið óheppið fyri t.d. føroyingar, sum hava siglt við fremmandum skipum. Kemur hesin til skaða ella gerst sjúkur, meðan hann er heima hjá familjuni í Føroyum, t.d. í frítíð, so hevur hann ikki rætt til dagpening eftir føroysku dagpeningaskipanini, uttan so at hann hevur verið her í minst 6 vikur frammanundan, at hann gjørdist sjúkur ella kom til skaða.

Tað sama er galdandi fyri Føroyskar handverkarar og aðrar, sum í styttri tíðarskeið arbeiða uttanlands.

Havandi í huga, at hetta eru føroyskir skattaborgarar, sum oftani orsakað av tørvandi vinnumøguleikum í Føroyum ikki hava annan møguleika enn at fara uttanlands at forvinna pening, kann tað sýnast órímiligt, at hesir ikki eisini kunnu hava somu rættindi, sum aðrir skattaborgarar í Føroyum.

Skotið verður tí upp at víðka dagpeningaskipanina soleiðis, at teir persónar, sum sigla við fremmandum skipum ella fyribils arbeiða uttanlands, kunnu fáa rætt til dagpening eftir føroysku dagpeningalógini, um so er, at teir hava fastan bústað í Føroyum og eru heilt ella lutvíst skattskyldugir í Føroyum.

Viðmerkjast skal, at broytingin í lóg fyri Føroyar um dagpening vegna sjúku ella barnsburð verður gjørd við heinuild í rammulógini fyri almannaøkið, sum er framløgd í løgtinginum, men ikki samtykt enn. Tað er tí ein fyritreyt fyri at hetta løgtingslógaruppskot kann samtykkjast, at rammulógin er samtykt frammanundan.

1. viðgerð 26. apríl 1995. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 20. apríl 1995.

Við 1. viðgerð tann 26. apríl 1995 varð málið beint í almanna- og heilsunevndina.

Almanna- og heilsunevndin hevur viðgjørt málið. **Ein samd nevnd** tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 19. mai 1995. Uppskotið samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 22. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

Lóg nr. 94 frá 13. juni 1995.

147 Broyting í ymsum lógum innan almanna- og heilsuøkið

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í ymsum lógum innan almanna- og heilsuøkið.
(strikan av heimild løgtingsins at velja limir í nevndir, stýrir og ráð v.m.)

§ 1.

Í lóg fyri Føroyar um sjúkrahúsverkið smb. lógarkunngerð nr. 137 frá 6. mars 1991 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 1, 1. pkt. verður "hvoraf 3 udpeges af Færøernes lagting, 2 af Færøernes landsstyre" broytt til: "ið verða tilnevndir av Føroya landsstýri".
2) Í § 2, stk. 2, 2. pkt. verður "lagtinget og" strikað.
3) § 2, stk. 5, 1. og 2. pkt. verður orðað soleiðis:
   "Útbyggingingarætlanin fyri samlaða sjúkrahúsverkið verður umsitin av eini ráðleggingarnevnd, ið telur 5 limir, sum landsstýrið tilnevnir. Landsstýrið tilnevnir 1 lim fyri hvørt sjúkrahús ímillum tilnevndu sjúkrahússtýrislimirnar, meðan hinir 2 limirnir kunnu vera persónar, ið ikki eru limir í sjúkrahústýrunum."

§ 2.

Í Kgl. fyriskipan nr. 389 frá 15. november 1966 um lógskylduga vanlukkutrygging við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 9, 1. pkt. verður "lagting" broytt til: "landsstýri".

lagtingslov om ændring af forskellige love inden social- og sundhedsområdet.
(ophævelse af lagtingets hjemmel til at vælge medlemmer i nævn, styrer og råd m.m.)

§ 1.

I lov for Færøerne om sygehusvæsenet jfr. lovbekendtgørelse nr. 137 af 6. marts 1991 foretages følgende ændringer:

1) I § 2, stk. 1, 1. pkt. ændres "hvoraf 3 udpeges af Færøernes lagting, 2 af Færøernes landsstyre" til: "som udpeges af Færøernes landsstyre".
2) I § 2, stk. 2, 2. pkt. bliver "lagtinget og" ophævet.
3) § 2, stk. 5, 1. og 2. pkt. affattes således:
   "Planlægningen af udbygningen af det samlede sygehusvæsen varetages af et planlægningsudvalg bestående af 5 medlemmer, som udpeges af landsstyret. Landsstyret udpeger 1 medlem for hvert sygehus blandt de udpegede sygehusbestyrelsesmedlemmer, medens de 2 andre medlemmer kan være personer, der ikke er medlem af sygehusbestyrelserne."

§ 2.

I Kgl. anordning nr. 389 af 15. november 1966 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 9, 1. pkt. ændres "lagting" til: "landsstyre".

2) Í § 9, 2. pkt. verður "lagtinget" broytt til: "landsstýrið".

§ 3.

Í løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978 um húsalánsgrunnin við seinni broytingum verða hesar broytingar gjørdar:

1) § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Grunnurin verður fyrisitin av einum av landsstýrinum tilnevndum stýri við 3 limum og 3 tiltakslimum. Stýrið verður valt fyri 4 ár. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni."
2) § 3, stk. 4, 3. pkt. verður strikað.

§ 4.

Henda lóg fær gildi 1. juni 1995.

2) I § 9, 2. pkt. ændres "lagtinget" til: "landsstyret".

§ 3.

I lagtingslov nr. 97 af 1. november 1978 om boliglånefond med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 3, stk. 1 affattes således:
"Fonden administreres af en af landsstyret udpeget bestyrelse med 3 medlemmer og 3 suppleanter. Bestyrelsen vælges/udpeges for 4 år. Bestyrelsen konstituerer sig selv med formand."
2) § 3, stk. 4, 3. pkt. ophæves.

§ 4.

Denne lov træder i kraft 1. juni 1995.

Viðmerkingar:

Løgtingið álegði landsstýrinum við løgtingssamtykt 22. juni 1994 at leggja fyri løgtingið innan 1. januar 1995 m.a. uppskot til løgtingslóg, sum leggur allar heimildir løgtingsins at velja limir í nevndir, stýri og ráð til landsstýrið.

Hetta uppskot til løgtingslóg um broyting av ymsum lógum innan almanna- og heilsuøkið tekur av heimildir løgtingsins at velja limir í sjúkrahústýrini, Vanlukkutryggingarráðið og Húsalánsgrunnin. Hesir limir verða í staðin valdir av landsstýrinum.

Viðmerkjast skal, at broytingin í Lóg fyri Føroyar um sjúkrahúsverkið verður gjørt við heimild í rammulógini fyri heilsuøkið, sum er framløgd í løgtinginum, men ikki samtykt enn. Tað er tí ein fyritreyt fyri at omanfyri standandi uppskot kann samtykkjast, at rammulógin er samtykt frammanundan.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 94/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

Lóg nr. 93 frá 13. juni 1995.

148 Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði løgmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. verður gjørd henda broyting:

§ 9 verður orðað soleiðis:

"**§ 9.** Hevur løgmaður ella landsstýrismaður, tá hann tekur við, størv í almennari tænastu ella privatum virkjum, samtøkum ella stovnum, skal hann vanliga siga tey frá sær. Tó kann hann í hendinga førum við samtykki løgmans halda tilfkum størvum, um løgmaður heldur, at tey ikki kunnu hava við sær trupulleikar í røkjan av embætisskyld hansara sum landsstýrismaður. Løgmaður boðar løgtinginum frá, hvørji størv avvarðandi landsstýrismaður framvegis hevur loyvi at røkja og hvørji størv hann sjálvur framhaldandi ætlar at røkja."

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag og pension v.m. til landsstyremænd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 10 af 8. januar 1993 om vederlag og pension v.m. til landsstyremænd foretages følgende ændring:

§ 9 affattes således:

"**§ 9.** Besidder lagmanden eller en landsstyremedlem ved sin tiltræden hverv i offentlige eller private virksomheders, foretagenders eller institutioners tjeneste, vil disse som regel være at fratræde. Dog kan han undtagelsesvis, med lagmandens samtykki bevare sådanne hverv, hvis lagmanden vurderer, at de ikke kan berede vanskeligheder i udførelsen af embedspligten som landsstyremand. Lagmanden meddeler lagtinget, hvilke erhverv vedkommende landsstyremand fortsat har tilladelse til at varetage og hvilke hverv han fortsat har i sinde at varetage."

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Sambært galdandi lóg skal løgmaður, um hann gevur landsstýrismanni loyvi at varðveita størv, meðan hann er landsstýrsimaður, geva fíggjarnevndini boð um hetta, og kann

fíggjarnevndin innan 14 dagar sýta landsstýrismanni at varðveita størvini.

Tá nýggja stýrisskipanarlógin kemur í gildi, er tað ikki sambæriligt við hana, at fíggjarnevndin tekur støðu til slík mál.

Skotið verður tí upp, at løgmaður tekur støðu til slíkar umsóknir, og at hann síðan boðar løgtinginum frá hesum. Tingskipanin, sum ætlandi kemur í gildi á Ólavssøku, hevur ásetingar um fráboðanir frá løgmanni.

Um tingið ikki heldur tað vera sambæriligt, at landsstýrismaður heldur starvinum, kann tingið leggja fram uppskot um misálit á løgmann og/ella landsstýrismannin.

Um so er, at løgmaður sjálvur ætlar at halda ávís størv, boðar hann løgtinginum frá hesum á sama hátt, sum nevnt er omanfyri.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 25. mai 1995. Uppskotið samtykt við 22-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram ískoytisálit.

Sí ískoytisálit í tingmáli 103/1994.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

Lóg nr. 90 frá 13. juni 1995.

149 Broyting í løgtingslóg um tænastumenn landsins

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði løgmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumenn landsins.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 6, stk. 2 verða orðini "aftan á tilmæli frá lønarráðnum" strikað.
2) Í § 32, stk. 2 verða orðini "aftan á ummæli frá lønarráðnum" strikað.
3) Í § 33 verða orðini "aftan á ummæli frá lønarráðnum" strikað.
4) Í § 35 a verða orðini "aftan á tilmæli frá lønarráðnum" strikað.
5) Kapitul 8, §§ 36 og 37, verður strikað.
6) Í § 43, stk. 4 verður orðað soleiðis:
   "**Stk. 4.** Landsstýrið kann fyriseta reglur um løn ella lønaraldur skal missast heilt ella lutvíst undir tænastufrí eftir stk. 2 ella undir styttari arbeiðstíð."

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landets tjenestemænd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 31 af 5. juli 1971 med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 6, stk. 2 udgår ordene "efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet".
2) I § 32, stk. 2 udgår ordene "efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet".
3) I § 33 udgår ordene "efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet".
4) I § 35 a udgår ordene "efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet".
5) Kapitel 8, §§ 36 og 37, udgår.
6) I § 43 affattes stk. 4 således:
   "**Stk. 4.** Bestemmelser om hel eller delvis bevarelse af løn og lønanciennitet under tjenestefrihed efter stk. 2 eller under nedsat tjenestetid kan fastsættes af landsstyret."

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Sambært galdandi lóg um tænastumenn er lønarráðið eitt ráð, sum landsstýrið kann leggja allar spurningar um tænastumenn fyri til ummælis, og í summum førum skal ráðið geva ummæli. Lønarráðið er samansett av løgtingslimum valdum av løgtinginum, umboðum fyri fakfeløgini, sum eru góðkend at umboða tænastumenn, og landsstýrinum, sum velur formannin. Umboðini fyri løgtingið skulu vera eitt meira enn hini umboðini tilsamans, t.v.s. at løgtingsumboðini hava meiriluta í ráðnum.

Sambært nýggju stýrisskipanarlógini kann løgtingið ikki longur velja umboð í slík ráð, og metir landsstýrið, at grundarlagið fyri at hava lønarráðið fellur burtur.

Lønarráðið hevur ikki avgerðarrætt í nøkrum spurningi, men kann bert gera tilmæli til landsstýrið. Landsstýrið heldur tað tí vera óneyðugt, at landsstýrið fer at velja eitt ráð aftrat at gera tilmæli til landsstýrið, men heldur, at hesir spurningar kunnu avgreiðast millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfeløg.

Viðmerkjast kann, at góðkendu tænastumannafeløgini eru kunnað um uppskot landsstýrisins, men hava feløgini havt ov stutt skotbrá at ummæla uppskotið. Tey fáa møguliga hetta høvi, tá málið kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram ískoytisálit.

Sí ískoytisálit í tingmáli 103/1994.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lóg nr. 73 frá 13. juni 1995.

150 Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði løgmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 3 verða orðini "aftaná ummæli frá lønarráðnum" strikað.
2) Í § 4, stk. 2 verða orðini "aftaná ummæli frá lønarráðnum" strikað.
3) Í § 4, stk. 5 verða orðini "aftaná ummæli frá lønarráðnum" strikað.
4) Í § 4, stk. 6 verða orðini "aftaná ummæli frá lønarráðnum" strikað.
5) Í § 4 a, stk. 1 verða orðini "aftaná ummæli frá lønarráðnum" strikað.
6) Í § 4 b verða orðini "aftaná ummæli frá lønarráðnum" strikað.
7) Í § 18 verða orðini "aftaná ummæli frá lønarráðnum" strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi ólavsøkudag 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om tjenestemandspension.

§ 1.

I lagtingslov nr. 32 af 5. juli 1971 om tjenestemandspension med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 2, stk. 3 udgår ordene "efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet".
2) I § 4 stk. 2 udgår ordene "efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet".
3) I § 4, stk. 5 udgår ordene "efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet".
4) § 4, stk. 6 udgår ordene "efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet".
5) I § 4 a, stk. 1 udgår ordene "efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet".
6) I § 4 b udgår ordene "efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet".
7) I § 18 udgår ordene "efter indhentet udtalelse fra lønningsrådet".

§ 2.

Denne lov træder i kraft olajdag 1995.

Viðmerkingar:

Sambært galdandi lóg um tænastumenn er lønarráðið eitt ráð, sum landsstýrið kann leggja allar spurningar um tænastumenn fyri til ummælis, og í summum førum skal ráðið geva ummæli. Lønarráðið er samansett av løgtingslimum valdum av løgtinginum, umboðum fyri fakfeløgini, sum eru góðkend at umboða tænastumenn, og landsstýrinum, sum velur formannin. Umboðini fyri løgtingið skulu vera eitt meira enn hini umboðini tilsamans, t.v.s. at løgtingsumboðini hava meiriluta í ráðnum.

Sambært nýggju stýrisskipanarlógini kann løgtingið ikki longur velja umboð í slík ráð, og metir landsstýrið, at grundarlagið fyri at hava lønarráðið fellur burtur.
Lønarráðið hevur ikki avgerðarrætt í nøkrum spurningi, men kann bert gera tilmæli til

landsstýrið. Landsstýrið heldur tað tí vera óneyðugt, at landsstýrið fer at velja eitt ráð aftrat at gera tilmæli til landsstýrið, men heldur, at hesir spurningar kunnu avgreiðast millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfeløg.

Viðmerkjast kann, at góðkendu tænastumannafeløgini eru kunnað um uppskot landsstýrisins, men hava feløgini havt ov stutt skotbrá at ummæla uppskotið. Tey fáa møguliga hetta høvi, tá málið kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini.

1. viðgerð 24. apríl 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 103/1994.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum.

31. mai 1995 legði rættarnevndin fram ískoytisálit.

Sí ískoytisálit í tingmáli 103/1994.

3. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lóg nr. 74 frá 13. juni 1995.

151 Skipan millum Føroyar og Ísland um sínámillum fiskirættindi í 1995

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar úrslitið av samráðinguum í Reykjavík 3. februar 1995 millum Føroyar og Ísland um sínámillum fiskiveiði í 1995, ið var soljóðandi:

Føroysk skip kunnu veiða 5.000 tons av botnfiski, av hesum í mesta lagi 700 tons av toski, 400 tons av kalva, 100 tons av svartkalva og 1.000 tons av brosmu, á íslendsknm øki, meðan íslendsk skip kunnu veiða tilsamans 2.000 tons av síld og 1.000 tons av makreli á føroyskum øki. Loyvt verður 16 føroyskum línuskipum í senn at veiða undir Íslandi.

Viðmerkingar:

Á fundinum í Reykjavík 3. februar 1995 luttóku fyri Føroyar: Ivan Johannesen, landsstýrismaður, Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri og Ulla Svarrer Wang, fulltrúi.

Fyri Ísland luttóku: Torsteinn Pálsson, fiskimálaráðharri, Árni Kolbeinsson, ráðharrastjóri og Jón B. Jónasson, Snorri Rúnar Pálmason og Jakob Jakobsson.

Tølini fyri føroysku botnfiskaveiðuna undir Íslandi í 1994 vóru løgd fram. Ísland hevði ongan fiskiskap undir Føroyum í farna ári.

Undan samráðingunum var væntandi, at niðurskurður fór at verða í heildarkvotuni og avmarkingar fyri ávís fiskasløg út um tey vanligu (toskur og kalvi).

Úrslitið var ein niðurskurður í heildarkvotuni uppá 1.000 tons, og avmarkingar fyri tosk, kalva, svartkalva og brosmu. Orsøkin til avmarkingarnar var ráðgeving frá fiskifrøðingum.

Partarnir fóru fgjøgnum samstarvið um fiskirannsóknir og teir fiskastovnar, sum eru á havleiðunum hjá báðum. Semja var um at taka stig til at fáa í lag samstarv við onnur lond, sum partarnir hava fiskastovnar saman við, serliga viðvíkjandi norðurhavssildini. Dentur varð lagdur á tørvin á at samskipa fiskirannsóknir á víðu havleiðunum vestan fyri fiskimarkið hjá báðum londum.

Partarnir umrøddu sjónarmiðini viðvíkjandi at gagnnýta hval og kóp, serliga seinastu gongdina í altjóða hvalaveiðunevndini, IWC, umframt arbeiðið í NAMMCO og øðrum altjóða felagsskapum.

1. viðgerð 27. apríl 1995. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 20. apríl 1995 og varð eftir 1. viðgerð 27. apríl 1995 beint í Marknaðarnevnd løgtingsins.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við formannin í fiskivinnunevndini Henrik Old, landsstýrismannin í fiskivinnumálum Ivan Johannesen og Kai P. Mortensen, fulltrúa.

Marknaðarnevndin ásannar, at illa ber til at finnast at, at føroyskar kvotur við Ísland afsamt minka. Føroyar hava gjøgnum árini at kalla einki latið afturfyri tær kvotur, sum føroysk skip hava fingið undir Íslandi, og tá ið kvoturnar nú minka, byggir tað á lívfrøðilig tilmæli. Tó ger marknaðarnevndin vart við, at føroyskur fiskiskapur eftir svartkalva undir Íslandi fer at minka nógv sambært hesi avtalu, úr uml. 1100 tonsum í 1994 niður í 100 tons í ár, og heitir marknaðarnevndin á landsstýrið at bøta um hetta undir komandi samráðingum.

Við hesum viðmerkingum mælir **ein samd marknaðarnevnd** løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins um "Skipan millum føroyar og Ísland um sínámillum fiskirættindi í 1995".

Undir viðgerðini varð spurt, um landsstýrið, eftir at nýggja stýrisskipannarlógin er sett í gildi, fer at leggja sáttmálar um fiskiveiðuavtalur millum Føroyar og onnur lond fyri løgtingið. Landsstýrið upplýsti, at sambært nýggju stýrisskipannarlógini skulu sáttmálar av tílíkum slag ikki leggjast fyri tingið. Í hesum sambandi vísir marknaðarnevndin til uppskotið, sum løgtingið samtykti undir viðgerðini av fiskiveiðusáttmálunum millum Føroyar, Russland og Baltisku londini, og mælir til, at landsstýrið og løgtingið finna hóskandi mannagongd at fyrireika komandi samráðingar millum Føroyar og Ísland.

2. viðgerð 19. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett til 22. mai 1995.

Við atkvøðugreiðsluna 22. mai 1995 varð málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

152 Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1995

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið góðkennir hjáløgdu avtalu frá 26. januar 1995 millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1995.

Viðmerkingar:

Váttaða frásøgnin frá fundinum millum føroyskar og norskar myndugleikar í Tórshavn 6.- 7. desember 1994 um sínámillum fiskirættindi í 1995 er løgd hjá.

Ikki bar til at semjast um avtaluna í Tórshavn 6.- 7. desember 1994. Ymisk mál skiltu partarnar, sum neyðugt var at umrøða við politiskn myndugleikarnar. Fundur var millum Ivan Johannesen, landsstýrismann og norska fiskimálaráðharran Jan Henry T. Olsen í Keypmannahavn 13. desember 1994 og í Oslo 26. januar 1995. Á hesum fundi varð sáttmálin undirskrivaður.

Semja varð funnin um at venda aftur til málið um landingar av veiði í loynikrókinum við skipum, sum ikki hava avtalu við strandalondini Noreg og Russland. Harumframt skuldi spurningurin um søguligu rættindi Føroya við Svalbard viðgerast seinni. Føroyskir myndugleikar høvdu lagt fram greiniligari tøl, sum geva Føroyum størri søgulig rættindi við Svalbard.

Eftir at hesi mál vóru umrødd var semja um at undirskriva sáttmálan millum Føroyar og Noreg fyri 1995. Sáttmálin er tann sami sum 1994 sáttmálin, tó er føroyska toskakvotan í norskum sjógvi norðanfyri 62°N økt við 100 tonsum.

Hjálagt er yvirlit yvir føroysku og norsku kvoturnar 1990-1995.

1. viðgerð 27. apríl 1995. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. apríl 1995, fekk 1. viðgerð 27. apríl 1995 og varð beint í marknaðarnevdina.

Marknaðarnevnd Løgtingsins hevur viðgjørt málið um skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1995. Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við formannin í fiskivinnunevndini Henrik Old, við landsstýrismannin Ivan Johannesen og við Kaj P. Mortensen, fulltrúa.

Marknaðarnevndin er greið yvir, at stórir trupulleikar vóru at fáa semju við Noreg fyri 1995, og kann marknaðarnevndin tí góðtaka, at sáttmáli er gjørdur fyri 1995 á sama støði sum í 1994, og mælir **ein samd marknaðarnevnd** løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Undir viðgerðini varð spurt, um landsstýrið eftir at nýggja stýrisskipanarlógin er sett í gildi, fer at leggja sáttmálar um fiskiveiðuavtalur millum Føroyar og onnur lond fyri løgtingið. Landsstýrið upplýsti, at sambært nýggju stýrisskipanarlógini skulu sáttmálar av tílíkum slag ikki leggjast fyri tingið. Í hesum sambandi vísir marknaðarnevndin til uppskotið, sum løgtingið samtykti undir viðgerðini av fiskiveiðusáttmálunum millum Føroyar, Russland og Baltisku londini, og mælir til, at landsstýrið og løgtingið finna hóskandi mannagongd at fyrireika komandi samráðingar millum Føroyar og Noreg.

2. viðgerð 19. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Við atkvøðugreiðslunu 22. mai 1995 varð málið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

153 Skipan Føroya og ES millum um sínamillum fiskirættindi í 1995

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði løgmaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu skipan dagfest 14. oktober 1994 um sínámillum fiskirættindi í 1995 Føroya og ES millum.

Viðmerkingar:

1. Tann 14. oktober 1994 vóru samráðingar millum umboð fyri ES-nevndina og Føroya Landsstýri í Brüssel um sínámillum fiskirættindi í 1995. Úrslitið av samráðingunum er hjálagda skipan, undirritað í Brüssel 14. oktober 1994.

2. Sáttmálin fyri 1995 javnvigar á sama støði í toskavirði, sammett við sáttmálan fyri 1994. Við møguleika fyri at Noreg gjørdist limur í ES frá 1. januar 1995 varð hædd tikin fyri hesum við kvotabýtinum í ANNEX. Gjørdist Noreg ikki limur í ES skuldi ANNEX (bis) koma í gildi, ið eru somu kvotur sum í 1994 undantikið makrelkvotuna, ið fylgir TAC'num. Noreg gjørdist ikki limur í ES, ANNEX (bis) er tí í gildi.
3. Loyvdu veiðunøgdirnar í 1995 av ósløgdum fiski eru hesar:

Hjá ES-skipum á føroyska landleiðini:

Tonsini av botnfiski, svartkjafti og makreli verða í 1995 (1994-tøl í klombrum, har broytingar eru):

500 tons av toski og hýsu
2.500 - upsa
7.000 - - kongafiski
3.600 - - blálongu og longu (íroknað stinglaks og langasporl)
1.000 - - flatfiski (svartkalvi íroknaður)
760 - - ymiskum fiskasløgum
25.000 - - svartkjafti
4.910 - - makreli (kvotan var 6.170 tons í 1994)

Hjá føroyskum skipum í ES-sjógvi:

(a) 800 tons tilsamans av longu, brosmu og blálongu á Rock All-leiðini at veiða við línu. Loyvt er eisini at veiða 400 tons av ymiskum botnfiski sum hjáveiðu í ídnaðarfiskiskapi; í 1994 vóru nøgdirnar tær somu. Eisini er loyvt at veiða 940 tons av blálongu við troli á havleiðunum vestan fyri Skotland.

(b) 5.890 tons av tí vestara makrelstovninum (kvotan var 7.410 tons í 1994). Roknað verður við, at Føroyar fáa loyvi at veiða 1.000 tons av kvotuni fyri 1994 eystan fyri 4°V, vísandi til stk. 2 í váttaðu frásøgnini frá samráðingunum í Brüssel.

(c) 7.000 tons av rossamakreli.

(d) 20.000 tons av ídnaðarfiski umfatandi hvítingsbróður, nebbasild, hjáveiðu av svartkjafti og íroknað hægst 2.000 tons av brislingi.

(e) 660 tons av sild vestan fyri Skotland.

(f) 62.000 tons av svartkjafti. Í veiðuni av svartkjafti er loyvt at hava hjáveiðu av gulllaksi, sum ikki slepst undan. Sambært váttaðu frásøgnini verður hjáveiðureglan viðvíkjandi gulllaksi ikki hildin uppi (håndhævet) fyrstu 24 tímarnar aftaná at fiskiskapur er byrjaður, tó so, at varir fiskiskapurin minni

enn 24 tímar, skal hjáveiðureglan viðvíkjandi gulllaksi verða hildin áðrenn fiskifarið fer av fiskileiðini.

(g) 500 tons av sild í Skagerak.

(h) 125 tons av hemara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3 PS (St. Pierre og Miquelon).

Hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi (samb. § 1 (3) í fiskisáttmálanum millum EF og Grønland).

(i) 1.150 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV/V.

(j) 150 tons av svartkalva undir Vesturgrønlandi NAFO-øki 0/1 og 150 tons undir Eysturgrønlandi ICES-øki XIV/V.

(k) Eisini verður loyvt at veiða 500 tons av kongafiski undir Eysturgrønlandi ICES-øki XIV/V.

(l) Loyvt er í 1994 at veiða 10.000 tons av lodnu við Eysturgrønland ICES-øki XIV/V.

Vísandi til grein 2.2 í váttaðu frásøgnini er á sama hátt sum árini undan grundarlagið undir semjuni um makrel, at ein heildarkvota verður avtalað millum Noreg, EF og Føroyar. Minkar heildarkvotan, so fáa Føroyar eisini minni part. Heildarkvotan av makreli er minkað við góðum 100.000 tonsum úr 493.250 tonsum í 1994 niður í 391.540 tons í 1995.

Reglurnar fyri fiskiskapi eru óbroyttar í 1995 hjá báðum pørtum.

Váttaða frásøgnin týdd til føroyskt og allur sáttmálin fyri 1995 á enskum eru løgd hjá.

Váttað frásøgn um samráðingar um fiskiskapin millum Europeisku Samgonguna og Føroyar í Brüssel 14. oktober 1994.

1. Ein sendinevnd umboðandi felagsskapin við harra Ole Tougaard sum formanni, og ein sendinevnd umboðandi Føroya Landsstýri við harra Kjartan Hoydal sum formanni, hittust í Brüssel 14. oktober 1994 til samráðingar um sínámillum fiskiskap í 1995.

2.1 Í samsvari við avtaluna um fiskirættindi millum ES øðrumegin og ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri hinumegin, samdust sendinevndirnar um at viðmæla myndugleikum teirra, at tær kvotur fyri 1995, ið eru upproknaðar í hjálagda skjali, skulu galda fyri skip hjá øðrum partinum, sum fiska í sjógvi hjá hinum partinum.

2.2 Partarnir umrøddu røktina av og veiðu av vestara makrelstovninum í samband við víðkanina av ES 1. januar 1995 og vóru samdir um, at tiltøk áttu at verið gjørd, sum avtalað, fyri at fremja varðveiting og gagnnýtan av hesum stovni.

Føroyski parturin greiddi frá ætlan síni at avmarka veiðuna í 1995 av vestara makrelstovninum í føroyskum sjógvi og føroyska veiðuna í altjóða sjógvi í norska havinum (ICES øki IIa) til í mesta lagi 27.200 tons, íroknað 12.000 tons til ES í føroyskum sjógvi.

Hesa nøgd hava føroyingar góðkent útfrá einum ES-TAC fyri ICES økini V b (EF øki) VI, VII, VIII a, b, d, e, XXI, XIV uppá 493.250 tons fyri 1995. Partarnir tilskila sær rætt til broytingar, um TAC víkir frá nevnda tonsatalið. Í slíkum føri samdust partarnir um at samráðast, so at veiðiavmarkingin, sum Føroyar ganga undir og kvoturnar, sum verða býttar millum partarnar, verða rætta samsvarðandi.

Um ES avger at teirra fiskimenn kunnu fiska partar av teirra kvotu, sum er ásett til EF makrelveiðu í ICES øki II a (uttan ES øki), V b (ES øki), VI, VII, VIIIa, b, d, e, XII og XIV í ES økinum hjá ICES IV a norðanfyri 59°N, skulu føroyskir fiskimenn sleppa at taka sama part av føroysku kvotuni uppá 7.410 tons á ES-økinum á ICES IVa, norðanfyri 59°N.

Partarnir vóru samdir um at ásettu veiðunøgdirnar fyri 1995 viðvíkjandi vestara makrelinum var ein ad-hoc avtala fyri 1995 og ikki prejudiserar framtíðar avtalur.

Um ein nýggj støða viðvíkjandi víðkan av limatalinum skuldi komi í, samdust partarnir um at samráðast fyri ársenda fyri at tryggja at avtalan virkar, grunda á býti útgreina í ANNEX (bis).

2.3 Um kvoturnar hjá føroyskum skipum, sum fiska í grønlendskum sjógvi, sambært grein 1 (3) í EF-Grønland protokollini (1995 - 2000) var semja.

2.4 ES-samráðingarnevndin setti fram eitt ynski frá ES-fiskimonnum um loyvi at reka royndarveiðu eftir langa-sporli (Roundnose Grenadier) í føroyskum sjóøki.

Føroyska sendinevndin lovaði at viðgera eina umsókn um tílíka royndarveiðu við vælvild, eftir treytum ið føroysku myndugleikarnir seta í samráð við umsøkjararnar.

2.5 Partanir umrøddu føroyska svartkjaftafiskiskapin í ES økið við atliti til galdandi hjáveiðureglur fyri gulllaks. Fyri at betra møguleikan fyri hesum fiskiskapi, var semja um at hjáveiðureglan ikki skal verða hildin uppi fyrstu 24 tímarnar eftir at fiskiskapur er byrjaður. Um so er at fiskiskapurin varir minni enn 24 tímar skal hjáveiðureglan viðvíkjandi gulllaksi vera hildin áðrenn fiskifarið fer av fiskileiðini.

2.6 Sendinevndirnar samdust um, at um annar parturin ætlar at seta í gildi ella broyta fiskireglur, ið koma at galda fyri fiskifør hjá hinum partinum, skal hann boða hinum partinum frá slíkum ætlanum við minst 14 daga ávaring. Sam-

ráðingar skulu verða, um annar parturin ynskir tað. Serliga varð sipað til ikki tíðaravmarkaðu steingingina av Føroya Banka við bannið fyri beinleiðis fiskiskapi eftir toski og hýsu.

2.7 Samráðingarnevndirnar samdust um, at loyvisreglurnar, sum skulu galda fyri 1995 skulu vera samsvarandi frásøgn dagfest 14. oktober 1994 viðvíkjandi loyvum.

2.8 Samráðingarnevndirnar samdust um, at hvør partur skal senda hinum partinum mánaðarhagtøl, og um annar parturin heldur tað vera neyðugt, viktuhagtøl fyri veiðu hjá skipum hjá hinum partinum á sínum fiskiøki.

Samráðingarnevndirnar samdust eisini um, sum eina royndarskipan at boða hvørjum øðrum frá samansetingini av veiðuni kvotum undir "øðrum sløgum" grundað á upplýsingar á avreiðingarseðlum í samljóð við lóggávu teirra.

2.9 Partarnir ásannaðu tað neyðuga í skilagóðari stýring av fiskiskapinum latin undir hesi avtalu, fyri at tryggja munadygga varðveiting av fiskastovnum og samdust um at umhugsa møguleikan fyri størri sínamillum samstarvið í hesum málið.

2.10 Sáttmálapartarnir samdust um tørvin á at fara undir eina varisliga stýring av ávísum djúphavsfiskasløgum, sum lítil kunnleiki er um í løtuni. Sáttmálapartarnir samdust um at taka málið uppaftur til viðgerðar á 13. ársfundinum í NEAFC.

2.10 Sáttmálapartarnir váttaðu, at teir tóku undir við semju um altjóða fiskivinnu, Brüssel 4. desember 1986.

Brüssel, 14. oktober 1994.

EEC-sendinevndin	Føroyska sendinevndin
Ole Tougaard (sign.)	Kjartan Hoydal (sign.)
Samráðingarnevndin	Samráðingarnevndin
fyri Felagsskapin	fyri Føroyar

1. viðgerð 27. apríl 1995. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 20. apríl 1995 og undir 1. viðgerð 27. apríl 1995 beint í Marknaðarnevnd Løgtingsins.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við formannin í fiskivinnunevndini Henrik Old, landsstýrismannin í fiskivinnumálum Ivan Johannesen og Kai P. Mortensen, fulltrúa. Eisini hevur nevndin útvegað veiðitøl í sambandi við avtaluna millum Føroya og ES í 1994, sum vísa, at hvørgin parturin nýtir sínar kvotur til fulnar. Undir viðgerðini kom tó fram, at helst fara føroysk skipa at gagnnýta alla makrelkvotuna í ES sjógvi í 1995.

Marknaðarnevndin metir, at javnvág er millum londini, men ger vart við einstakar trupulleikar, ið eiga at verða loystir undir næstu samráðingunum. Í sambandi við ES fiskiskap í føroyskum sjógvi er tað ein trupulleiki, at somu reglur viðvíkjandi stongdum og friðaðum leiðum ikki eru galdandi fyri ES skip, sum fyri føroysk skip. Í sambandi við føroyskan fiskiskap í ES sjógvi metir marknaðarnevndin, at tað hevði verið betri, um serstøk kvota var fingin fyri gulllaks, heldur enn at gulllaksurin bert er loyvdur sum ávís hjáveiða í sambandi við svartkjaftafiskiskap.

Undir viðgerðini varð spurt um landsstýrið, eftir at nýggja stýrisskipannarlógin er sett í gildi, fer at leggja sáttmálar um fiskiveiðuavtalur millum Føroyar og onnur lond fyri løgtingið. Landsstýrið upplýsti, at sambært nýggju stýrisskipannarlógini skulu sáttmálar av tílíkum slag ikki leggjast fyri tingið. Í hesum sambandi vísir marknaðarnevndin til uppskotið, sum løgtingið samtykti undir viðgerðini av fiskiveiðusáttmálunum millum Føroya, Russland og Baltisku londini og mælir til, at landsstýrið og løgtingið finna hóskandi mannagongd at fyrireika komandi samráðingar.

Við hesum viðmerkingum mælir **ein samd marknaðarnevnd** løgtinginum til at samtykkja løgtingsmál nr. 153 um skipan Føroya og ES millum um sínámillum fiskirættindi í 1995.

2. viðgerð 17. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett til 22. mai 1995.

Við atkvøðugreiðsluna 22. mai 1995 varð uppskotið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

154 Øktir inntøkumøguleikar hjá sethúsaeigarum frá ferðavinnuni

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum, saman við ferðavinnuni, Íbúðagrunninum, Húsalánsgrunninum, peningastovnunum og kommunum, at finna fram til figgingarmøguleikar, so áhugaðir sethúsaeigarar kring landið kunnu fáa høvi at seta í stand gomul sum nýggj sethús, so tey í størri mun enn nú kunnu nýtast til at leiga út til og hýsa ferðafólki.

Viðmerkingar:

Hetta uppskot verður sett fram við atliti til júst framlagda lógaruppskot landsstýrisins at endurstovna íbúðagrunnin.

Uppskotið er ætlað sum ein royndi:

1. At økja um møguleikarnar hjá fólki at vinna pening úr ferðavinnuni.
2. At útvega landsbúskapinum nýggjar inntøkur frá fremmandum ferðafólki og spara landshúsarhaldinum útreiðslur við fleiri tilboðum til innlendis ferðing.
3. At skapa arbeiði til handverkarar og fyritøkur í byggivinnuni.
4. At varðveita og økja virðið á sethúsamassanum kring landið, sum annars er í vanda fyri at fara fyri skeyti av fráflyting og húsavanrøkt.

Uppskotið byggir á ta grundreglu, at hin einstaki sethúsaeigarin sum vant eigur og ræður yvir privatogn síni, tekur sjálvur avgerð, um hann vil nýta henda fløgumøguleika og ábyrgjast persónliga av teirri eyka lánbyrðu, sum hansara virðisøktu sethús skulu forrenta. Men kortini er ætlað, at ferðavinnan kann fáa seravtalu við eigaran um ein part av árinum at leiga út til ferðafólk tóm sethús, sum verða gjørd í stand eftir hesi skipan. Eigarin fær inntøkuna av hesi útleigu.

Tað gerst meir og meir neyðugt við tiltøkum til at varðveita og halda viðlíka tað vaksandi talið av tómum sethúsum. 2.000 flóttafólk úr Føroyum árliga svarar til uml. 3-400 niðurløgd húsarhald. So leingi landsstýrið tvíheldur um sosialistisku katastrofukósina við økjandi skattatrýsti og hækkandi kostnaðarstøði, sum føra til størri arbeiðsloysi og vaksandi fráflyting, so leingi veksur talið á sethúsum kring oyggjarnar, sum antin standa tóm eftir tvingsilssølu, ella sum misfarast, tí eigarin hevur mist

inntøkuna og hevur ikki ráð at halda tey viðlíka.

Ferðavinnan er fyri vist ein enn alt ov lítið troytt innløgukelda fyri hitt einstaka húsarhaldið og búskapin sum heild. Vit vita av meiningakanningum millum útlendsk ferðafólk í Føroyum, at náttúran, ferðasambandið, frítíðarhøvi til gongd, súkkling og koyring í vøkrum umhvørvi, stuttleikaítriv sum fisking, fuglacygleiðing, ja eintá ljósið og veðurlagið draga fremmandafólk higar. Men útboðið í Føroyum av bíligari gisting, sum í Bretlandi "Bed & Breakfast", í Danmark summarhús, ella í Noreg fjallasmátturnar, er heldur avmarkað.

Búskaparkreppan rakar eina harðast byggivinnuna. Eink húsasmíð er longur, og samstundis verða tóm hús, ið skjótt forfalla, alt meir vanlig, ikki bert í útjaðaranum, men nú eisini inni á meginøkinum.

Vit hava helst størri bústaðarøki upp á fólkið enn flest onnur lond. Við fráflytingini standa 10-túsundtals fermetrar av gólvplássi nú ónýttir. Bústaðarøki er eitt hitt størsta aktiv, vit eiga, men tað má gagnnýtast. Ferðavinnan er eyðsýndur møguleiki til slíka eyðnýtslu.

Húsalánsgrunnurin og peningastovnarnir eiga støðugt vaksandi tal av úrrýmdum húsum, sum forfalla. Fólk, sum eru flutt frá útplássum, men sum eiga ella hava arvað gomul hús sí heimbygdini, og sum megnaðu at halda tey viðlíka í 80-árunum, hava nú ikki longur ráð til tess og mugu lata tey danka av. Vanrøkt hús níva sinnið bæði hjá eigara og hjá bygdarfólkinum.

Verða útvegir funnir fyri rímiligari fígging til at seta í stand og innrætta gomul sum nýggj sethús kring landið, verður úrslitið nógv størri útboð av feriuhúsum til útlendskar og føroyskar gestir. Hotelgrunnurin er ikki til longur, men hann hevði kunnað partfíggjað slíkt tiltak. Húsalánsgrunnur og peningastovnar hava beinleiðis áhuga í, at hús, sum teir eiga (vónandi bert fyribils) verða hildin viðlíka í staðin fyri at forfarast. Talan nýtist bert vera um nakrar fáar 10-túsund kr. fyri hvørt húsið til at gera tey til eina inntøkukeldu fyri eigaran. Ferðavinnan heldur stórum tali av sethúsum uppi sum leiguhús um summarið í fleiri av okkkara grannalondum. Hví ikki eisini her á landi?

Privatir eigarar av hesum sethúsum kunnu við samskipaðari útleigu ein part av árinum, væl serliga summarið, gjøgnum Ferðavinnuna tryggja húsunum eina inntøku til framtíðar viðlíkahald, rentur og avdráttir. 100 kr. um dagin upp á fólkið í feriu er rímiligt. Familja ella ferðalag upp á 5 fólk kundu leigað hús fyri 400-500 kr. um samdøgrið. Í 8 vikur, juni og juli, gevur tað 60 (dagar) x 4-500 kr. = 25 - 30.000 kr. íalt. Altso nóg mikið til at forrenta 200.000 kr. í lánum.

Størri tal av sethúsum, útleigað sum ferðamannasmáttur nakrar vikur ella mánaðir hvørt ár, hevði umframt givið nakrar daglønir til eigarar ella fólk á staðnum fyri ferðavinnutænastur. Føroyskum kommunum verður slíkt samskipað tiltak ein skattlig inntøka.

Trupulleikin er fígging. Samskipan millum kommunalar og landsmyndugleikar,

ferðavinnuna, peningastovnarnar og sethúsaeigarar er tað, sum er neyðugt, og sum nú skortar. Eingin vandi er í øesum tíðum fyri, at sethúsaeigarar spenna seg harðari fyri við slíkum fløgulánum í sethús, enn tann eyka inntøkan av útleigu til ferðafólk kann bera.

Fingu smærri útlendsk ferðaløg, bólkar og familjur innivist í væl hildnum, fjálgum og reinum sethúsum á okkara náttúruvøkru oyggjum, leitaðu ivaleyst fleiri ferðafólk henda veg. Sum er koma bert uml. 25.000 "turistar" higar árliga, sammett við 200.000 til Íslands (hóast ferðamannaskipið er føroyskt!). Hesir 25.000 feriugestir máttu kunnað tvífaldast, um útboðið av bíligum innivisti í góðum sethúsum var størri og betur samskipað. Harumframt høvdu føroyingar sjálvir helst gjørt meir av at ferðast kring um í egnum landi. Tað hevði skapt arbeiði og spart gjaldsjavnanum nógvan pening.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av fólkaflokkinum tann 20. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 2. mai 1995 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariassen og Tordur J. Niclasen) vísir á, at 7 mió. kr. eru avsettar til ferðamannavinnuna á fíggjarlógini fyri 1995 og at skattafrádráttarskipan er sett í verk fyri umvæling av sethúsum og mælir tí tinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Finnbogi Ísakson) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið fall við 8-0 atkvøðum.

155 Ungdómsarbeiði við fornminnum til ferðavinnuna

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at flyta hóskandi og munagóða peningaupphædd á § 13: Samferðsla og samskifti, og § 18: Vinnulív og arbeiðsmarknaður annars, t.d. 5 mió. kr. í verandi fíggjarári og frameftir, sum skal brúkast til at seta í stand gomlu bygdagøturnar og varðarnar í samstarvi millum Landsverkfrøðingsstovnin og ungdóms- og ítróttafeløg kring landið.

Viðmerkingar:
Tað snørist samanum allastaðni. Játtanin til útbygging og viðlíkahald av vegakervi og havnum er skarvað úr 400 niður í góðar 100 mió. kr. eftir 7 árum, samstundis sum ungmanna-, ítrivs, áhuga- og ítróttarfeløg gremja seg um, at tey fáa langt í frá tær sømdir á fíggjarlógini, sum tey plagdu at fáa. Játtanin til ungmannafeløgini er í 95 sett til uml. 1,5 mió. kr. (íroknað innanoyggja og øløgur íroknað).

Játtanin til "vinnuterapi" til ung er 8 mió. kr.

Somulciðis eru játtanir til øll fornminni, søvn o.a. settar til 9 mió. kr., falt samsvarandi lakari almennum innløgum. Nú tá mestsum bert hin almenni sektorurin er eftir av tí upprunaliga vinnufíggjaða búskapinum, hoyknar hann eyðvitað undir síni egnu (yvir)vekt.

Samstundis verður roynt at menna ferðavinnuna. Í 95 eru játtaðar um 7 mió. kr. til endamálið.

Ferðavinnan er hon við frægast framtíðarútlitum. Hon gevur uttaneftir uml. 150-200 mió. kr. tilsamans í inntøkum árliga. Men vit skulu ikki gera okkum vónir um munandi vøkstur í ferðafólkatalinum, um vit ikki miðvíst fjálga um fornminni og mentannarligu sercyðkenni okkara.

Ein nógv undirmettur partur av Føroya søgu er okkara gomlu bygdagøtur, sum vóru grundarlag undir øllum samskifti heilt fram til koyrivegirnar og bilarnar. Varðarnir fram við gøtunum eru partur av hesum siðaarvi.

Fjallagøturnar og teir symbolsku varðarnir eru yvirhøvur farin í forna, og nógvastaðni er farvegurin neyvan at hóma longur, hóast tær vórðu tráddar av nógvum fótum

dagliga. Tó hava vit stundum hoyrt, at t.d. skótar hava sjálvbodnir hampað gøturnar og laðað varðar uppaftur. Nøkur munnu eisini av eintingum leggja steinar upp á varðarnar, tá tey ganga framvið.

Frá meiningakanning millum útlendsk ferðafólk í Føroyum vita vit, at tey geva oyggjum okkara góð skoðsmál fyri náttúruupplívingar, sum tað ber til at fáa her. Summi leita hendan vegin mest fyri at ganga fjøllini, eygleiða fugla- og plantulív og sita við tráðuni við vøtn og tjarnir.

Tíðvdu gomlu bygdagøturnar verið væl kortmerktar, í góðum standi, lættar at finna og ganga, eisini í támutum veðri og um summardimmini, høvdu tær ivaleyst lagt til umdømi Føroya sum ferðamannnaland.

Landsverkfrøðingsstovnurin hevur víst hesum mentaarvi okkara ans og lagt onkra ætlan fyri ábótum á varðar og bygdagøtur. Landsstýrið veit av hesum.

Nú prísurin á føroyskari arbeiðsmegi er pressaður so høgt upp av m.a. skattatrýstinum, loysir lítið og einki vinnuligt virksemi seg longur. Hvørki vit ella útlandið hava ráð til at gjalda fyri føroyska kostnaðarstøðið. Ungdómur okkara sleppur tí ikki at nýta sínar nógvu kreftir í vinnuni til egið gagns og har við búskaparins. Almennar játtanir til "arbeiðsskapandi tiltøk" eru smyrslroyndir at bøta um tann skaða, sum alment avskeplaða kostnaðarstøðið hevur gjørt á búskapin.

Ungmannafeløgini gremja seg um, at tær rummisligu almennu játtanirnar í 80-árunum til teirra virksemi eru so nógv skerdar.

Tí verður skotið upp her, at ein partur av játtanini til Landsverkfrøðingsstovnin, og til § 13 og til § 18: Vinnulívið og arbeiðsmarknaður (Tiltøk fyri ung) verður brúktur til at seta bygdargøtur kring landið í stand. Stovnurin eigur amboð og royndar arbeiðsleiðarar til at skipa fyri hesusm umvælingum. Ungmannafeløgini kundu fingið fíggjarliga ágóðan av hesum mennandi kropsliga arbeiði hjá limunum.

Ferðamannavinnan hevði fingið eitt aktiv aftrat í hesum bygdagøtum til at "selt" føroyar sum ferðamannaland. Allur búskapurin hevði fingið gagn og nyttu burtur úr hesum tiltaki.

1. viðgerð 3. mai 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið var lagt fram av fólkatlokkinum tann 20. aprfl 1995 og eftir 1. viðgerð 3. mai 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariassen, Finnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen) tekur ikki undir við málinum og vísir á, at 8 mió. kr. eru settar av á fíggjarlógini 1995 til tiltøk fyri ung í arbeiði, og at Ferðaráð Føroya hevur fingið játtanina hækkaða úr 4,5 mió. kr. í 1994 til 7 mió. kr. í 1995.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 31. mai 1995. Málið fall við 8-0 atkvøðum.

156 Ognar- og yvirvaldsrættur yvir havleiðum uttan fyri 200 fjórðinga fiski- og búskaparmørk

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Finnbogi Ísakson, løgtingsmaður, vegna tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at fáa fund í lag millum teir suverenu statirnar Kanada, Ísland, Noreg og Rusland og tey sjálvstýrandi londini Føroyar og Grønlandi við hesum endamáli:

1) Londini lýsa sín felags ognar- og yvirvaldsrætt til havleiðirnar uttan fyri verandi 200 fjórðinga fiski- og búskaparmørk í Norðurhøvum og tí partinum av Norðuratlantshavi, sum hesi lond liggja í ella at.
2) Londini skipa ein felagsskap at umsita alt lív - fisk, skeljadýr, plantur, hval, kóp og fugl - á hesum havleiðum.
3) Felagsskapurin avger einsamallur, hvat, hvussu nógv og hvør kann veiða á hesum leiðum.
4) Tá veiðunøgd verður ásett, skal grundarlagið fyri ásetingini vera tann týdningur, sum veiðan hevur fyri búskapin sum heild í hvørjum landi sær.

Viðmerkingar

Týðningurin av og áhugin fyri fiskiskapi uttan fyri fiskimørkini er vaksandi. Fleiri millumtjóða felagsskapir eru, sum geva tilmæli um veiðu á hesum leiðum. Nevnast kunnu NAFO, sum "umsitur" fiskiskap í útnyrðingspartinum av Atlantshavi, IWC, sum "umsitur" stórhvalaveiðu um allan heim, og NAMMCO, sum er hvalafelagsskapur millum lond í Norðuratlantshavi.

Hesi seinastu árini er tað vorðið alsamt greiðari, at hesir felagsskapir antin ikki virka út frá nøktandi sjónarmiðum (IWC) ella ikki eru førir fyri at umsita tað, teir eru ætlaðir til (NAFO).

Eitt dømi er, at IWC "umsitur" stórhvalaveiðuna ikki út frá vísindaligum, men umhvørvisligum (djóraverndarligum og djóravinarligum) sjónarmiðum og als ikki á ein slíkan hátt, sum hvalaveiðutjóðir út frá vísindaligum sjónarmiðum halda, at stórhvalaveiðan eigur at vera umsitin.

Annað dømi er fiskiskapur í Loynikrókinum og úti fyri Kanada. Í Loynikrókinum fiska fyri stóran part skip, sum hoyra heima ella eru skrásett í fjarum londum, ið onki hava við henda fiskiskap at gera uttan at vera skrásetingarland. Skip, skrásett í td. Føroyum, kunna ikki vera við í fiskiskapinum, tí aðrar avtalur binda.

Kanada hevur júst havt eitt stríð við ES um svarikalvaveiðu uttan fyri 200 fjórðingar. Tann niðurfisking av fleiri fiskastovnum, sum serliga Spania og Portugal hava framt, hevur havt ólukkuliga ávirkan fyri fiskiskapin hjá millum øðrum ný fundlendingum og føroyingum. Stríðið millum Kanada og ES endaði við, at Kanada fær størri ræði yvir havleiðunum uttan fyri 200 fjórðingar.

Í Irmingarhavinum er framvegis óskerd veiða, men tað er bert ein spurningur um tíð, til kvotur eisini verða ásettar har. Verða søgulig veiðutøl nýtt sum grundarlag fyri kvotunum er vandi fyri, at fjarskotin lond, td. japanarar, fara at fáa ríkiliga kvotu, meðan td. føroyingar fáa lítla kvotu.

Hesi fáu dømi eru góð prógv um, at um verandi gongd heldur fram, gerast summar tjóðir vinnarar, eisini tjóðir sum ikki búgva her um leiðir, og aðrar verða taparar, teirra millum føroyingar.

Fyri at fáa tamarhald á viðurskiftunum verður tí skotið upp, at londini í Norðurhøvum og einum parti av Norðuratlantshavi lýsa sín felags ognar- og yvirvaldsrætt yvir havleiðunum uttan fyri 200 fjórðinga fiski- og búskaparmørkini. Londini skula so í felag umsita tað livandi ríkidømið á hesum leiðum.

Samstundis verður skotið upp, at føroyingar beinanvegin leggja dent á tað sjónarmið, at kvotur, sum verða ásettar, eiga at verða grundaðar á tann týdning, sum veiðan hevur fyri búskapin í hvørjum einstøkum landi sær sum heild.

1. viðgerð 3. mai 1995. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av tjóðveldisflokkinum tann 20. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð tann 3. mai 1995 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg 3 minnilutar.

Undir viðgerðini hevur marknaðarnevndin havt fund við Ivan Johannesen, landsstýrismann, Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóra og Kai P. Mortensen, fulltrúa. Eisini hevur uppskotsstillarin Finnbogi Ísakson verið á fundi.

Umboðini úr landsstýrinum greiddu marknaðarnevndini frá, at Føroyar higartil hava tikið undir við teimum altjóða tiltøkum, sum m.a. ST hevur tikið stig til í sambandi við at skipa fiskiskap í altjóða sjógvi, og at Føroyar hava tikið undir við ST-havrættarsáttmálanum, ið ásetur, at strandaiond sum eru fevnd av avtaluni, ikki eiga serrættindi uttanfyri 200 fjórðinga fiskimørk.

Í løtuni arbeiðir ein ST ráðstevna við spurninginum um gagnnýtslu av ferðandi fiskastovnum. Væntandi verður seinasti fundur í New York í summar. Tað merkir, at altjóða samfelagið kemur til eina niðurstøðu um røkt av ferðandi fiskastovnum í hesum árinum. Størstu spurningarnir í hesum samráðingunum eru:

1. Spurningurin um, hvør hevur eftirlitið uttanfyri 200 fjórðingar, hvør kann taka skip, sum fiska ólógliga, og hvør kann stevna tey.
2. Fáa lond, har búskapurin bara byggir á fiskivinnu, serlig rættindi?

Uppá fyrispurning váttaði landsstýrið, at tann praktiski fiskiskapurin síðani 1989 í altjóða sjógvi, t.m. uttanfyri 200 fjórðinga fiskimørkini, so at siga hevur yvirhálað ST-havrættarstevnuna, sum ikki nóg væl ásetur greiðar reglur fyri eitt nú týningini av svartkalva stovninum í New Foundlandi og Kanada, fyri fiskiskapi í Loynikrókinum, fyri fiskiskapi í Irmingarhavinum o.s.fr.

Landsstýrismaðurin Ivan Johannesen helt tað vera best at bíða við at samtykkja eitt mál sum hetta, til ST-samráðingarnar eru lidnar í summar, og á tann hátt at halda fram við at royna at loysa trupulleikarnar um ovurfiskiskap, stovnsrøkt og fordeiling saman við ST.

Marknaðarnevndin spurdi landsstýrið, hvørjar avleiðingar tað fær fyri Føroyar, at broyta kós í spurningurin um hvussu altjóða fiskiskapur eigur at verða skipaður, til tess at røkja føroysk áhugamál.

Tað merkir fyrst og fremst, greiddi landsstýrið frá, at Føroyar føra ein nógv meiri virknan fiskivinnupolitik, og at tað er ein spurningur um vit hava umstøður til tess.

Undir viðgerðini kom tað fram, at gongdin viðvíkjandi fiskiskapi í altjóða sjógvi seinastu árini vísir, at trupult er hjá smáum strandalondum av verja sítt lívsgrundarlag.

Gongdin hevur eisini víst, at í stríðnum at vinna fiskirættindi í altjóða høpi kunnu Føroyar lætt gerast eftirbátur. At alsamt fleiri lond bera uppá mál at flyta síni fiskimørk út, bendir eisini á, at tað gongur ov seint at skipa fiskiskapin í altjóða sjógvi. Landsstýrið vísti á, at Føroyar helst ongan fyrimun fáa av at flyta fiskimarkið út.

Ein minniluti (Jógvan Durhuus, Jenis av Rana og Bjarni Djurholm) tekur undir við uppskotinum.

Ein annar minniluti (Helena Dam á Neystabø) metir ikki, at tílíkur fundur forðar fyri, at Føroyar framhaldandi eru við í tí arbeiði, sum fer fram í ST høpi, og tekur undir við uppskotinum. Um so er, at uppskotið ikki verður samtykt, tekur minnilutin (Helena Dam á Neystabø) undir við uppskotinum, sum minnilutin (Jákup Lamhauge, Jógvan Adolf Johannessen og Kristian Magnussen) setur fram.

Hin triði minnilutin (Jákup Lamhauge, Jógvan Adolf Johannessen og Kristian Magnussen) vísir á, at í døgunum frá 27. juli til 4. august verður 7. ST-ráðstevnan um ferðandi fiskastovnar, har londini, sum uppskot tjóðveldisfloksins hevur til endamáls, at Føroyar skulu taka upp samráðingar við, eru millum tey luttakandi londini. Fleiri av hesum londum seta stórar vónir til, at eitt rímiligt úrslit fer at spyrjast burtur úr hesi ráðstevnu.

Minnilutin heldur tað ikki verða rætt, nú beint undan hesi ráðstevnu, at Føroyar taka slíkt stig, sum tjóðveldisflokkurin hevur uppskot um í løgtingsmáli nr. 156/1994. Hinvegin heldur minnilutin at um so verður, at einki nøktandi úrslit spyrst burtur úr ST-ráðstevnuni, eigur landsstýrið at taka spurningin upp tá .

Út frá hesum kann minnilutin (Jákup Lamhauge og Jógvan Adolf Johannessen og Kristian Magnussen) ikki taka undir við málinum og setir í staðin fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Um so er, at einki spyrst burtur úr ST-ráðstevnuni, heitir løgtingið á landsstýrið at skipa fyri millumlanda fundi millum Kanada, Ísland, Noreg, Russland og Føroyar og Grønland, við tí endamáli at kanna møguleikarnar fyri nærri samstarvi og felags umsiting av havleiðunum uttanfyri verandi 200 fjórðinga fiski- og búskaparmørk.

2. viðgerð 1. juni 1995. Uppskot tjóðveldisfloksins samtykt við 17-0 atkvøðum.

157 Afturgjalding av sethúsaskuld

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Finnbogi Ísakson, løgtingsmaður, vegna tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Undir teirri fyritreyt, at sparikassarnir verða við til eina afturgjaldsskipan, eftir høvuðstankunum niðanfyri, av sínum útlánum til sethús og Føroya Banki av tí partinum av sínum sethúsalánum, sum ikki verða avskrivað, áleggur Løgtingið landsstýrinum at broyta lógina um Húsalánsgrunnin soleiðis:

1) Lánstíðin kann vera í mesta 50 ár og í minsta lagi 20 ár, um ikki lántakarin ynskir hana stytri.
2) Afturgjaldstíðin lagar seg innan fyri hesi mørk eftir inntøkuni hjá lántakaranum.
3) Miðað verður eftir, at lánsgjøldini (rentur og avdráttur) ikki fara upp um 25% av inntøkuni hjá lántakaranum. Tó fer ein størri partur av inntøkuni til lánsgjøld, um hetta krevst fyri at halda longstu lánstíð uppá 50 ár.
4) Útrokningin av lánsgjøldunum verður grundað á upplýsingar frá Toll- og Skattstovuni um inntøkuna hjá lántakaranum. Serligar reglur verða gjørdar fyri lánsgjøldini hjá fólkum, sum reka ella luttaka í frífari vinnu.

Viðmerkingar

Sambæri løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978 var ein líknandi skipan, sum her verður skotin upp, galdandi fyri afturgjalding av lánum úr Húsalánsgrunninum. Eftir landsstýrisskiftið í januar 1981 varð skipanin tikin av, og varð hon tí bert royndi í eini trý ár.

Skipanin riggaði sum heild væl. Høvuðstrupulleikin var, at hon bert var galdandi fyri Húsalánsgrunnin og ikki fyri lán úr banka ella sparikassa. Síðani er skattaskipanin løgd um til samtíðarskatt, og tað eigur at vera lættari at umsita eina slíka skipan nú enn tá.

Í viðmerkingunum um nýggja lóg fyri Húsalánsgrunnin, sum landsstýrið legði fyri tingið 14. apríl 1978, varð sagt um henda partin av skipanini:

"Skotið verður upp, at lánini í framtíðini skulu gjaldast aftur yvir eitt tíðarskeið, ið røkkur millum 20 og 40 ár. Avgjøldini, tað eru rentur og avdráttur, skulu laga seg eftir inntøkuni hjá lántakaranum, og miðað verður fínóti, at lántakarin ikki skal nýta meira enn 20% av sínu inntøku tilsamans at gjalda rentur og avdráttir av lánum við. Hetta

verður tó ikki gjørligt at halda, um 20% av inntøkuni ikki røkka til eitt lán, ið skal afturgjaldast yvir 40 ár, ið er hámarkið fyri afturgjaldstíð. Mett verður, at við galdandi rentu hjá Húsalánsgrunninum skal lántakari hava 125.000 kr. í inntøku, um 20% tað fyrsta árið skulu svara til rentur og avdrátt fyri eitt lán, ið verður afturgoldið yvir 40 ár. Roknast kann við, at tann vanliga afturgjaldstíðin kemur at liggja einastaðni millum 30 og 40 ár."

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið og legði álit fram 29. september. Ein meiriluti - Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Hilmar Bech, Jógvan Durhuus og Signar Hansen - tók undir við uppskotinum, sum varð samtykt við 20 atkvøðum.

Serkønir høvdu gjørt nógvar útrokningar í sambandi við nýskipanina. Roknast má við, at hetta tilfar finst á landsskrivstovuni og kann nýtast sum grundarlag fyri nýggjum útrokningum, sum broyttar tíðir við størri lánum og minni inntøkum hava við sær.

Nógvir sethúsaeigarar eru sera trongstaddir í hesum tíðum, og tann minkaða inntøkan hjá fólki yvirhøvur ger saman við øknum skatta- og avgjaldstrýsti, at kanska øll tey, sum hava bygt td. tey seinastu 15 árini, sita trongt í tí.

Tað er tí vert at taka spurningin upp at seta skipanina aftur í gildi, so at fíggjarstovnarnir fáa sín pening, bæði rentur og avdrátt, men at lánstíðin lagar seg eftir inntøkuni hjá lántakaranum og kann liggja onkustaðni millum 20 og 40 ár.

Ein treyt fyri, at ein slík skipan skal virka væl og gagna sethúsaeigarum nóg væl, er, at allir lánveitarar - Føroya Banki, sparikassarnir og Húsalánsgrunnurin - eru við.

Tað tykist tó ógjørligt at fáa nakra skipan, heldur ikki hesa, at virka, um ikki Føroya Banki avskrivar tann pening ella part av tí peningi, sum bankin hevur fingið almennan pening fyri, tí upphæddin er roknað sum mist.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 20. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 4. mai 1995 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariassen og Kristian Magnussen) heldur tað ikki vera rætt at broyta lógina um Húsalánsgrunnin soleiðis, at afturgjaldstíðin verður longd til í mesta lagi 50 ár og mælir sostatt tinginum frá at samtykkja uppskotið.

Ein minniluti (Finnbogi Ísakson) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Annar minnilutin (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar:

Allar sethúsaloysnir, sum byggja á at leingja afturgjaldstíðina út yvir 20 ár eru bert lappaloysnir. Fyriliggjandi uppskot gongur út uppá at leingja afturgjaldstíðina heilt upp í 50 ár, t.v.s. at tann, sum skal taka eitt tíllíkt lán, verður trælur av hesum alt sítt virkna lív og nakað afturat.

Ein annar vansi við at geva long og bílig lán er, at kostnaðurin av tí, ið fíggjað verður, verður tílsvarandi hægri. Vit hava nógv dømi um hetta.

Út frá hesum mælir minnilutin (Anfinn Kallsberg) frá at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

Hin triði minnilutin (Tordur J. Niclasen) tekur undir við uppskotinum og hevur hesar viðmerkingar:

Hvørja ferð mál viðvíkjandi Húsalánsgrunninum hava verið til viðgerðar, hevur Ijóðað frá øllum flokkum, at Húsalánsgrunnurin ikki í nóg stórt mát hjálpti fólki við fígging av sethúsabygging v.m., og at endamálið við grunninum sostatt ikki varð nátt.

Hóast broytingar síðan lógin í 1978 varð endurskoðað, so má ásannast, at frá politiskari síðu hevur ikki verið vístur stórsta vælvild fyri at økja um møguleikarnar hjá teim, ið festa búgv, í nóg stóran mun at merkja lætta við lántøkn júst úr hesum almenna grunni.

Í hesum døgum, har nógv hava trupult at fáa endarnar at røkka, man eingin ívi vera um, at tey sum sita eina ringast í tí, eru tey, sum sett hava fótin undir egið borð, og stríðast við rentur og avdráttir av stórum lánum.

Verður einki gjørt fyri at lætta um fíggjarbyrðuna hjá hesum, verður tað soleiðis, at enn fleiri fara á húsagang og noyðast at rýma frá húsi og heimi, og flyta av landinum.

Hetta í sær sjálvum, at familjur við børnum missa tak yvir høvdið er ein sorgarleikur, umfram at negativir sosialar avleiðingar fara at síggjast í samfelagnum, tá hópur av familjum aftrat koma í slíka støðu.

Í 1989 legði undirritaði (Tordur J. Niclasen) uppskot fram á ting, har roynt varð at broyta lógina um Húsalánsgrunnin soleiðis, at afturgjaldstíðin varð munandi longd og somuleiðis at grunnurin kundi veita rentu- og avdráttarskáa, eftir fastløgdum reglum.

Hevði uppskotið tá vunnið frama, so er eingin ívi um, at mong húski ikki vóru komin í ta støðu tey eru í í dag.

Hóast m.a. tjóðveldisflokkurin taldist ímillum teirra, ið ikki tóku undir við uppskotinum tá, so hevur Miðflokkurin ikki broytt støðu, og tekur tí undir við uppskotinum, sum Tjóðveldisflokkurin nú kemur við.

2. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið fall við 6-0 atkvøðum.

158 Minstamark fyri MVG-skráseting av føroyskum framleiðsluvirkjum

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Finnbogi Ísakson, løgtingsmaður, vegna tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at gera lógaruppskot um, at føroysk framleiðsluvirki ikki verða MVG-skrásett uttan so, at umsetningurin er 5 mió. kr. ella meira um árið.

Reglur verða samstundis gjørdar fyri, hvussu hesi virki kunna sleppa undan meirvirðisgjaldi á vøruinnflutningi til framleiðsluna ella fáa hetta gjald endurgoldið.

Viðmerkingar

Ein tann ringasta avleiðingin av skipanini við meirvirðisgjaldi var, at flestøll smærri framleiðsluvirki í landinum góvust.

Ein trupulleiki við at broyta skipanina við meirvirðisgjaldi er, at landsstýrið, sum sat frá 1991-93, fekk tað við í sáttmálan við ES, at Føroyar skuldu hava meirvirðisgjald. Verða heilt stórar broytingar gjørdar, verður tí neyðugt at samráðast við ES um hetta.

Men endamálið við skipanini kann ongantíð hava verið, at øll smærri føroysk framleiðsluvirki skuldu noyðast at gevast. Neyvan er orsøk at halda, at ES hevur nakað ímóti einari broyting, sum her verður skotin upp, og sum miðar ímóti, at smærri føroysk framleiðsluvirki verða hildin uttan fyri skipanina.

Eftir hesum uppskoti skulu framleiðsluvirki, sum hava minni enn 5 mió. kr. í ársumsetningi, ikki MVG-skrásetast.

1. viðgerð 28. apríl 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 20. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 26. apríl 1995 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur skattanevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen og Jørgen Niclasen) tekur ikki undir við uppskotinum. Meirilutin førir fram, at Føroyar hava gjørt eina avtalu við ES, ið førir við sær, at sama avgjald skal gjaldast á innfluttum vørum sum á vørum, ið verða framleiddar og seldar í Føroyum. Eitt slíkt uppskot gongur ímóti hesi avtalu.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 1. juni 1995. Málið fall við 7-0 atkvøðum.

159 Broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 um kærunevnd í almannamálum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Yvirskriftin til §§ 6 og 7 verður broytt frá "Skrivstova kærunevndarinnar" til: "Avgreiðsluskrivstova kærunevndarinnar".
2) § 6 verður orðað soleiðis:
   "**§ 6.** Tey mál, ið skulu viðgerast í kærunevndini, verða fyrireikað á Almanna- og heilsudeild landsstýrisins, ið aftrat málsøkjunum annars eisini hevur uppgávuna at virka sum avgreiðsluskrivstova hjá kærunevndini.
   Stk. 2. At taka sær av dagliga arbeiðinum at fyrireika kærumál og at vera fastur skrivari hjá kærunevndini í almannamálum setir landsstýrið eitt fólk á Almanna- og heilsudeildini á Landsskrivstovuni, ið skal hava løgfrøðiligt embætisprógv ella líknandi."
3) Í § 7, stk. 2 verður "Skrivstovan" broytt til: "Skrivarin".
4) Í § 7, stk. 3 verður "skrivstovu" broytt til: "skrivara".
5) Í § 7, stk. 4 verður "hjá skrivstovu" strikað.
6) Í § 8, stk. 3 verður "skrivstovuni" broytt til: "skrivaranum".

lagtingslov om ændring i lagtingslov om socialt ankenævn.

§ 1.

I lagtingslov nr. 47 af 23. marts 1993 om socialt ankenævn foretages følgende ændringer:

1) Overskriften til §§ 6 og 7 "Ankenævnets sekretariat" bibeholdes.
2) § 6 affattes således:
   "**§ 6.** Sager, der skal behandles af ankenævnet, forberedes i social- og sundhedsafdelingen i landsstyrets administration, der udover sagsområderne øvrigt, også fungerer som sekretariat for ankenævnet.
   Stk. 2. Til at tage sig af det daglige arbejde i sekretariatet og til at være fast sekretær for det sociale ankenævn ansætter landsstyret en person i social- og sundhedsafdelingen, der skal have bestået juridisk kandidateksamen el. lign."
3) I § 7, stk. 2 ændres "Sekretariatet" til: "Sekretæren".
4) I § 7, stk. 3 ændres "sekretariat" til: "sekretær".
5) I § 7, stk. 4 ændres "ankenævnets sekretariat" til: "ankenævnet".
6) I § 8, stk. 3 ændres "sekretariatet" til: "sekretæren".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum varð sett í gildi 1. apríl 1993 og verður lógin sambært § 11 at endurskoða um 3 ár, t.v.s. í tingsetuni 1995/95.

Hóast hetta verður nú lagt fram uppskot til broyting í lógini viðvíkjandi skrivstovu kærunevndarinnar.

Hetta er grundað á ymiskar trupulleikar, ið hava verið viðvíkjandi manningini av skrivstovuni. Fulltrúi varð settur í skrivarastarvið í tíðarskeiðinum 15. juli 1993 til 31. mars 1994, og nýggjur fulltrúi hevur verið settur í starvið frá 15. juni 1994 til 30. apríl 1995, og verður starvið nú lýst leyst aftur.

Trupulleikarnir við at tryggja støðugari viðurskifti viðvíkjandi fyrireiking av kærumálum til nevndina hava sostatt verið stórir, og má niðurstøðan vera, at skipanin, sum nú er, ikki kann halda fram.

Skipan við sjálvstøðugari avgreiðsluskrivstovu, sjálvstøðugur stovnur, og bert við einum fólki settum í starv, ber bert til undir framúr hepnum umstøðum. Hinvegin má tilfeingið, ið verður tillutað viðgerðini av kærum í almannamálum, eisini standa í rímiligan mun til, hvat ið verður tillutað almennari umsiting av tilfeingi til loysn av uppgávunum innan fyrisiting annars.

Fyri best møguligt at kunna skipa fyri støðugari viðurskiftum viðvíkjandi fyrireiking av kærumálum til kærunevndina í almannamálum verður mett, at uppgávurnar at virka sum avgreiðsluskrivstova hjá kærunevndini verður løgd til almanna- og heilsudeild landsstýrisins, og at fulltrúastarvið sum skrivari fyri nevndina soleiðis verður flutt til hesa deild á Landsskrivstovuni.

Fyri ordans skyld skal viðmerkjast, at uppskotið til lógarbroyting ikki hevur í sær broytingar annars enn viðvíkjandi avgreiðsluskrivstovuni. Kærunevndin verður sostatt framvegis kærumyndugleiki í almannamálum sambært almannalóggávuni, og verður mannagongdin í kærumálum óbroytt.

Viðmerkingar til einstøku broytingarnar:

Samanumtikið eru broytingarnar í §§ 6, 7 og 8 tilskilaðar avleiðingar av uppskoti um, at almanna- og heilsudeild landsstýrisins skal virka sum avgreiðsluskrivstova hjá kærunevndini í almannamálum.

1. viðgerð 26. apríl 1995. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 26. apríl 1995 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur havt fund við landsstýrismannin í almannamálum, umframt umboð fyri kærunevndina.

Landsstýrismaðurin greiddi frá, at at tað liggja fleiri enn 300 mál óviðgjørd í kærunevndini, og at hetta ikki var haldbart. Hann helt tað tí vera eina gongda leið at gera broytingina í lógaruppskotinum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Kristian Magnussen, Jørgen Nielsen og Lasse Klein) mælir frá at gera umtalaðu broyting og vísa á, at um so er, at uppskotið verður samtykt, kemur hetta at ganga út yvir rættartrygdina hjá fólki. Meirilutin í nevndini vísir á, at ætlaða broytingin hevur tað við sær, at skrivarin í kærunevndini kemur at arbeiða á almanna- og heilsudeildini og er tískil vandi fyri, at viðkomandi á tann hátt kemur at viðgera kærur, ið snúgva seg um avgerðir, sum eru tiknar eftir lógum og reglugerðum, ið almanna- og heilsudeildin vegna landsstýrið hevur ábyrgdina av.

Meirilutin heldur, at fyri at fáa avgreitt tey mál, ið hava ligið alt ov leingi uttan viðgerð í kærunevndini, eigur landsstýrið at søkja fíggjarnevndina um eykajáttan til skrivarahjálp og á tann hátt fáa málini, sum liggja, avgreidd sum skjótast.

Meirilutin metir tað vera neyðugt, at landsstýrið skipar fyri, at serligur stovnur uttanfyri landsumsitingina, burturav tekur sær av málum, sum snúgva seg um kærur frá borgarum, og á tann hátt slepst undan teimum trupulleikum, sum landsstýrið vísir á í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Minnilutin (Maria Hansen og Henrik Old) hevur hesar viðmerkingar:

Fyri at geva møguleika fyri at fáa avgreitt tey mál, ið liggja niðurfyri í kærunevndini í almannamálum skjýtur minnilutin upp at samtykkja uppskot landsstýrisins. Minnilutin er tó í prinsippinum samd við meirilutanum í, at hetta ikki skal vera ein varðandi loysn, og skjýtur tí upp, at heimildin verður tíðaravmarkað til 31. mars 1995.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 2 verður orðað:
"§ 2. Hendu lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. mars 1996."

§ 2 formuleres således:
"Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen og træder ud af kraft den 31. marts 1996."

2. viðgerð 26. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Við atkvøðugreiðsluna 29. mai 1995 fall málið við 15-0 atkvøðum.

160 Broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi

Ár 1995, hósdagin 20. apríl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 120 frá 23. desember 1991, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 176 frá 18. desember 1992, verður gjørd henda broyting:
Í § 2. stk. 2, verður skoytt uppí aftaná seinasta punktum:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fremstillings- og indførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 120 af 23. december 1991, som senest ændret ved lagtingslov nr. 176 af 18. december 1992, foretages følgende ændring:
I § 2, stk. 2, tilføjes efter sidste punktum:

"Eisini verður avgjaldið á framleiðslu og innflutningi á TS-vøruflokkarnar 87.11.10.00 og 87.12.00.00 strikað.".

"Endvidere bliver afgiften af fremstilling og indførsel af TS-Varegrupperne 87.11.10.00 og 87.12.00.00 aftaget."

§ 2

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd.

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendgørelsen.

Viðmerkingar:

Innflutningsavgjaldið á prutlum og súkklum er í dag 50% fyri prutl og 15% fyri súkklur.

Í sambandi við at skrásetingargjaldið á motorakførum lækkaði munandi í januar 1995, og at skrásetingargjaldið á motorsúkklum er lækkað, má ásannast, at núverandi innflutningsavgjald á prutlum og súkklum ikki er í tráð við, at onnur avgjøld fyri motorakfør eru lækkað.

Uppskot landsstýrisins er ein broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Skotið verður upp, at núverandi avgjøld fyri prutl (50%) og súkklur (15%) verða strikað.

Seinastu árini hevur innflutningurin av prutlum verið:
-1995: 9
-1994: 4
-1993: 16
og av súkklum:
-1995: 23
-1994: 1083
-1993: 753

1. viðgerð 26. apríl 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 26. apríl 1995 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Skattanevndin vísir á at við í hesi broytingini eru tollur og avgjøld á øllum aktørum farin niður uttan á motorsúklum og mælir nevndin til at landsstýrið tekur henda spurningin upp.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 72 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 2520-24/91.

161 Avtøka av løgtingslóg um karensdagar

Ár 1995, fríggjadagin 21. apríl legði Jenis av Rana, løgtingsmaður, vegna miðflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg nr. 187 frá 28. desember 1992 um avmarkingar av løn í samb. við sjúku.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 187 frá 28. desember 1992 verður sett úr gildi.

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. juni 1995.

lagtingslov om ophævelse av lagtingslov nr. 187 af 28. december 1992 om begrænsning af løn under sygdom.

§ 1.

Lagtingslov nr. 187 af 28. december 1992 om begrænsning af løn under sygdom ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. juni 1995.

Viðmerkingar:

Longu tá skipanin við karensdøgum varð sett í gildi, varð víst á bæði av fólki innan tinggátt og uttanfyri hesa, at ívasamt varð um sparing var í hesari lóg. Víst varð á vána royndir í grannalondum okkara og vandan fyri beinleiðis negativum árinum á samfelagsbúskapin.

Í uppskotinum, sum hin 30. okt. 1992 av landsstýrinum varð lagt fyri løgtingið stendur at lesa: "tað er ikki í løtuni møguleiki fyri at siga nágreinliga hvussu nógv verður spart av hesi orsøk, men roknar landsstýrið við at spara uml. 5 mió. kr. árliga á henda hátt".

Grundarlagið undir útrokningum landsstýrisins var eftir øllum at dømma ein meting um, at lógin í sjálvum sær ikki fór at ávirka sjúkradagamynstrið. Men alt týðir uppá, eins og í grannalondum okkara, at bæði tey ótilvitaðu og kanska eisini tey tilvitaðu hjáárinini, sum fleiri vístu á fóru at koma, hava verið her hjá okkum. Spurningurin er, um ikki hesi saman við kostnaðinum av at umsita hesa lóg, heilt hava tikið fíggjarliga grundarlagið undan hesari sokallaðu sparing.

Samanumtikið man hendan lógin hava ført lítið annað enn tyngjandi byrðar inn í dagliga dagin hjá mangari frammanundan hoyknandi føroyskari familju.

Hóskandi hevði tí verið sum skjótast at tikið hesa lóg av, og skuldi onkur verið, sum tvíheldur um at hetta fer at kosta landsstýrinum pening, so er sjálvsagdur møguleiki júst nú at fíggja hetta við tí peningi, sum sambært fíggjarmálaráðharranum er spardur undir júst lokna arbeiðssteðginum.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum tann 21. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 2. mai 1995 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Atli Hansen, Karl Robert Johansen, Henrik Old og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskotinum.

Hetta grundað á, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum undir sáttmálasamráðingunum seinast fingu í boði avtøku av karensdøgunum, men tóku ikki av.

Minniliutin (Jenis av Rana) tekur við niðanfyri standandi viðmerkingunum undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Síðani uppskotið varð lagt fram 20. aprfl 1995, eru viðmerkingar komnar frá m.ø. starvsmannafelagnum, sum í brævi dagf. 4. mai 1995 førir fram:

"starvsmannafelagið tekur fult undir við, at løgtingslógin um karensdagar verður avtikin og roknað vit við, at øll hini feløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum gera tað sama...tann avgerðandi orsøkin til, at karensdagarnir verða avtiknir er, at karensdagaskipanin hevur óhepna ávirkan á arbeiðsumstøðurnar. Fólk møta sjúk til arbeiðis og hava av somu orsøk ikki megi at arbeiða optimalt. Smittuvandin økist tá fólk, ið eru sjúk, møta til arbeiðis. Hetta kann hava við sær, at fleiri enn neyðugt gerast sjúk. Tá fólk eru vorðin so mikið sjúk, at tey ikki orka til arbeiðis, gerst sjúkralegan longri - bæði tá tað tekur longri tíð at koma fyri seg og tí at ein, ið hevur goldið báðar karensdagarnar, sjálvsagt ikki kemur til arbeiðis aftur fyrr enn viðkomandi er púra vís(ur) í ikki at leggjast aftur (og tá gjalda karensdagar einaferð afturat). skipanin er órættvís og ikki tann sama fyri øll. Á nøkrum stovnum ber til at arbeiða sær tíð at hava til góða, sum so kann verða nýtt í sambandi við karensdagagjald, meðan aðrir ikki geva starvsfólkunum henda møguleikan. Í londunum rundanum okkum, har hendan skipanin hevur verið, eru tey komin til ta ásannan, at taka hana av aftur og eru fleiri orsøkir til tess. Ein orsøk er, at skipanin er órættvís og dýr at umsita og ein ennur orsøk er, at vandi er fyri almannaheilsuni uppá longri sikt."

Undir 1. viðgerð í løgtinginum, og somuleiðis undir nevndarviðgerðini, førdu tingfólk - m.a. úr verkamannafylkingini fram, at lógaruppskotið eisini átti at fevnt um tey tímaløntu - og tað er púra rætt, og hevur uppskotsstillarin tí gjørt broytingina í fyriliggjandi uppskoti, so tað eisini fevnir um tey tímaløntu.

Hendan broytingin varð steðgað av embætisfólki á løgtingi og í landsstýri, sum føra fram, at Føroya løgting ikki uttan viðari kann fremja slíka broyting, hóast umráðið er føroyskt lógarøki. Tí verður hesin spurningur at bíða inntil viðari kanningarúrslit fyriliggja.

Undir nevndarviðgerðini varð fyrispurningur sendur landsstýrinum, har m.a. spurt varð um sparingar hava verið, og um sjúkradagamynstrið er broytt ta tíð, ið farin er síðani karensdagaskipanin kom í gildi. Svar kom úr landsstýrinum tann 18. mai 1995, har stjórin á lønardeildini, út frá einum einstøkum stovni og uttan eitt einasta skjal/tal/uppgerð/hagtøl/yviriit pástendur, at metingar landsstýrisins um sparingar hildu, og at sjúkradagamynstrið ikki er broytt.

Tíverri ynskti meirilutin í arbeiðaramálanevndini ikki at biðja um tey skjøl, sum liggja til grundar fyri hesum pástandi, tað hevði annars verið áhugavert, tí um tað veruliga er so, sum hesar upplýsingar lønarstjórans vilja verða við, so skilir ta fólk ið her býr, seg avgerðandi frá norrønu grannum okkara á hesum eina øki, tá havi verður í huga, at karensdagaskipanin í hesum londum verður mett ónýtilig. Annars eru hesar upplýsingar frá lønarstjóranum í andsøgn til tær upplýsingar leiðandi starvsfólk á umtalaða stovni - og leiðarar á øðrum stovnum - bera fram.

2. *viðgerð 29. mai 1995. Málið fall við 6-0 atkvøðum.*

162 Avtøka av ymsum løgtingslógum (Ídnaðar- og menningarmál)

Ár 1995, mikudagin 26. apríl legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av ymsum løgtingslógum. (Ídnaðar- og menningarmál).

§ 1.

Hesar lógir verða avtiknar:

1) Løgtingslóg nr. 77 frá 24. oktober 1978 um studningslán til útróðrarstøðir við seinni broytingum.
2) Løgtingslóg nr. 50 frá 28. mai 1984 um útjaðarafiskavirki.
3) Løgtingslóg nr. 35 frá 20. mai 1988 um veðhald fyri láni til frysti- og flakavirki.
4) Løgtingslóg nr. 109 frá 3. august 1990 um ískoyti til fiskavirkir.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ophævelse af forskellige love. (industri- og udviklingsområdet).

§ 1.

Disse love ophæves.

1) Lagtingslov nr. 77 af 24. oktober 1978 om tilskudslån til landingsanlæg for hjemmefiskeri med senere ændringer.
2) Lagtingslov nr. 50 af 28. maj 1984 om fiskerivirksomheder.
3) Lagtingslov nr. 35 af 20. maj 1988 om garanti for lån til frysc- og filétanlæg.
4) Lagtingslov nr. 109 af 3. august 1990 om tilskud til fiskevirksomheder.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendegørelsen.

Viðmerkingar:

Landsstýrið mælir til at avtaka hesar lógir, tá eingin játtan er á fíggjarlógini til hesi endamál, og lógirnar hava ikki verið brúktar í nógv ár.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 26. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð tann 4. mai 1995 beint í ídnaðarnevndina.

Ídnaðarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur **ein samd nevnd** undir málinum.

2. viðgerð 22. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum.

3. viðgerð 29. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 32-0 atkvøðum.

Lóg nr. 68 frá 13. juni 1995.

FL. jnr. 106-7/95.

163 Broyting í løgtingslóg nr. 86 frá 1. sept. 1983 um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1995, mánadagin 24. apríl legði Heine Lützen, løgtingsmaður, vegna miðflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at gera broytingar í skattalógini, soleiðis at galdandi frá 1. januar 1996 verður skattalógin broytt, so møguleiki verður hjá lijúnum at flyta part av inntøkuni sínámillum til skattingar. Tó so, at samlaða skattskylduga inntøkan hjá tí, ið inntøkan verður flutt til, í mesta lagi svarar til 70% av hægstu veiting frá arbeiðsloysisskipanini.

Viðmerkingar:

Uppskotið miðar ímóti at bøta um skattliga mismunin, ið húski við bert tí einu inntøkuni eru fyri, og samstundis at lætta um trýstið á arbeiðsmarknaðin, arbeiðsloysisskipanina og forsorgarhjálpina.

Arbeiðsloysið í Føroyum er stórt og fyri fleiri húski er galdandi at bæði kona og maður hava gingið arbeiðsleys í so langa tíð, at tey nú verða koyrd úr arbeiðsloysisskipanini,

og tí er bráðneyðugt at nakað verður gjørt fyri at fáa í minsta lagi annað teirra aftur í arbeiði.

Við hesum uppskoti kunnu arbeiðspláss gevast leys, um onnur háski, har bæði kona og maður hava arbeiði, fáa eina motivering fyri, at annað teirra kann velja at gerast heimaarbeiðandi. Hetta kann serliga gera seg galdandi fyri tey, ið hava rímiliga inntøku í løtuni, men hóast tað ikki fáa endarnar at røkka saman við bert einari inntøku. Við skattabýtinum og t.d. spardu útreiðslunum til barnaansing verður møguligt hjá hesi familju at klára seg við bert tí einu inntøkuni.

Hugsast kann eisini, at hjún, har annað í løtuni fær arbeiðsloysisstuðul og má ganga undir tær treytir, sum eru fyri hesum stuðli, (t.d. hava børnini í røkt fyri at kunna vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum) heldur velja skipanina við skattabýtinum, fyri at sleppa undan hesum treytum, og harvið spara gjøld til dagrøkt o.l. Harvið sparir arbeiðsloysistryggingin eisini veitingina til tann heimaarbeiðandi.

Landskassin kemur í fyrstu syftu at fáa minni skattainntøkur av hesum lógaruppskoti, og sum dømi kann nevnast: Maður, ið hevur inntøku kr. 250.000 flytir tær kr. 83.034 til skattingar hjá konuni. Úrslitið er, at landskassin fær kr. 18.600 minni í inntøku árliga. Talið er kr. 22.450 um mansins inntøka var kr. 350.000. Var inntøkan kr. 150.000 loysir tað seg ikki at flyta meiri enn helvtina t.v.s. kr. 75.000, og hevði tá minniinntøka landskassans verið kr. 13.500.

Tað, ið landskassin fær minni í inntøku, merkir, at hin einstaka familjan fær hesa upphædd meiri at ráða yvir. Samlaður fyribilsmissur landskassans verður neyvan meiri enn kr. 10 mió., men uppá longri sikt er hetta uppskotið við til at bøta um býtið av teimum fáu arbeiðsplássunum ið eru, og tað vil samstundis lætta um tað ovurstóra trýst, ið arbeiðsloysisskipanin knógvar undir.

1. viðgerð 27. apríl 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum tann 24. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 27. apríl 1995 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Ein samd skattanevnd vísir til løgtingsmál nr. 17/94: Javnbjóðis skatting av hjúnum og støkum, har ið løgtingið álegði landsstýrinum at kanna avleiðingarnar av eini slíkari skipan, og tekur tí ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 1. juni 1995. Málið fall við 8-0 atkvøðum.

164 Navnalógin endurskoðast

Ár 1995, mánadagin 24. apríl legði Jákup Olsen, løgtingmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at endurskoða navnalógina frá 1992 og leggja uppskot um neyðugar broytingar í lógini fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni.

Viðmerkingar:

Tá ið løgtingslógin um fólkanøvn endaliga kom í 1992, var tað ikki annað enn væntandi, at hon elvdi til stóra misnøgd, tí at broytingarnar vóru so nógvar og stórar.

Listin yvir fornøvnini, sum loyvd eru at geva børnum, er framvegis so lítil, at har er bara triðingurin av øllum teimum fornøvnum, sum føroyingar í dag eita.

Avtalur eru engar gjørdar t.d. við donsku myndugleikarnar. Tí ber nú til hjá føroyingum, sum fáa nei til eitt navn í Føroyum, at fara eina ferð niður til Danmarkar og har doypa børn síni við nøvnum, sum teir føroysku navnamyndugleikarnir síðani hava bara at retta seg eftir.

Dømi eru um, at hetta verður gjørt, sum varð ávarað ímóti, tá ið navnalógin var til viðgerðar á løgtingi. Onnur lond sum t.d. Ísland hava avtalur við grannalond, ið gera tað møguligt at umsita galdandi navnalóg.

Tað er í løtuni sera trupult í Føroyum, tí at ongar greiðar reglur og avtalur eru eitt nú við Danmørk, ið hevur eina heilt aðra navnalóg enn okkara.

Harumframt er føroyska navnalógin ógreið á fleiri økjum sum t.d. viðvíkjandi navnaskifti í samband við ættleiðing. Fyrr var tað Ríkisumboðsmaðurin, sum er ættleiðingarmyndugleiki og eisini segði frá, hvat navn ættleidda barnið framyvir kom at bera. Nú sigur ríkisumboðsmaðurin bara frá ættleiðingini, men einki um nøvnini, børnini framyvir skulu eita.

Navnalógin gongur út frá, at ættleiddu børnini varðveita fremmandu fornøvn og millumnøvn sín. Í so máta er ættleiðing ikki javnastillað við føðing.

Royndirnar vísa, at sjálvt um landsstýrið hevur heimild til at geva loyvi til, at fremmandu for- og millumnøvn verða broytt, so verður lítið søkt um tað.

Heldur ikki nevnir navnalógin nakað um broyting av millumnavni, um tað er loyvt á sama hátt, sum tá ið talan er um fornøvn og eftirnøvn.

Tað er vanligt, at nýggjar lógir, sum føra so stórar broytingar við sær, sum navnalógin hevur gjørt, verða tiknar upp til endurskoðingar eftir 3 árum.

Tí varð hetta við í samgonguskjølunum, sum 18 løgtingsmenn hin 30. august 1994 skrivaðu undir. Men í skjalinum hjá hesi samgongu, sum kom nakrar fáa dagar aftaná, er navnalógin ikki nevnd.

1. viðgerð 3. mai 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 24. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 3. mai 1995 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og metir tað ikki neyðugt at áleggja landsstýrinum at endurskoða navnalóggávuna og leggja uppskot um neyðugar broytingar fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni.

Landsstýrinum verður við hesum litið upp í hendi at meta, um tørvur er á eini endurskoðan av navnalóggávuni og slíkum broytingum, sum her er nevndar.

Ein samd rættarnevnd metir tað tískil óneyðugt við einum slíkum uppskoti og setir tí einki uppskot fram.

2. viðgerð 31. mai 1995. Málið fall við 10-0 atkvøðum.

165 Útsetan av ferð Nyrup Rasmussen's til Føroya vegna ósemju um dómarakanning av bankamálinum og kreppu í viðurskiftunum landanna millum

Ár 1995, mikudagin 26. apríl legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at heita á landsstýrið og danska ríkismálaráðið um at finna eina aðra tíð, sum hóskar betur, til Føroyaferð danska ríkismálaráðharrans.

Viðmerkingar

Sum støðan nú í longri tíð hevur verið millum Føroyar og Danmark, har danska stjórnin í samráð við Konservativa flokkin gongur ímóti einmæltu samtykt løgtingsins um ein kanningarrætt í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22.mars 1993, halda vit tað ikki vera hóskiligt, at forsætismálaráðharrin, sum so avgjørdur gongur ímóti einmæltu samtykt løgtingsins, kemur sum gestur hendan vegin beint nú.

Tað má haldast vera ein stór vanvirðing av løgtinginum, landsstýrinum og øllum føroyingum, at krav Føroya fólks og samtykt løgtingsins solciðis verður kveistrað til víks av donsku stjórnini og Konservativa flokkinum.

Fyrrenn ein loysn er fingin á spurninginum um bankakanningarnar, er ikki ráðiligt, at danska statsministaraparið kemur til Føroya at vitja.

Men tá skulu tey eisini vera væikomin.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð afturtikið.

166 Eitt útvarps- og sjónvarpsgjald fyri hvørt húski

Ár 1995, týsdagin 2. mai 1995 legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at fyrireika samanlegging av útvarps- og sjónvarpsgjaldinum til eitt gjald fyri hvørt húski.

Viðmerkingar

Tað er trupult hjá húsarhaldinum at fáa endarnar at røkka saman, tí at gjøldini eru so nógv, ið rindast skulu.

Fyrst verður stórur partur tikin av inntøkuni í skatti til land og kommunur; síðan komu gjøldini øll til ALS, arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, trygdargrunnin v.m., sum landsstýrið hjá fólkaflokkinum og javnaðarflokkinum legði oman á fólkið.

Av tí lítla, sum tá er eftir av lønarinntøkuni, krevur hitt almenna aftur gjøld sum til útvarpið, sjónvarpið, tvungin tryggingargjøld o.a., so at fólk hava bara so lítið eftir til mat, klæðir, bústað og annað, sum neyðugt er, at tað hongur illa saman hjá stórum parti av fólki okkara.

Avtalurnar, sum løgting og landsstýri hava gjørt við donsku stjórnina, peika á eina sparing við at leggja stovnar og umsiting saman.

Sjálvt um tað verður ikki farið so langt sum til, at útvarp og sjónvarp verða løgd saman, so man nakað vera at spara við, at umsitingin, uppkrevjingin og gjøldini verða løgd saman og minka tilsvarandi fyri hvørt húski í landinum.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 26. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 2. mai 1995 og beint í mentannar- og skúlanevndina eftir 1. viðgerð tann 4. mai 1995.

Nevndin hevur viðgjørt málið, men heldur ikki, at málið er væl fyrireikað í síni heild.

Ikki tí, at nevndin ikki heldur, at landsins íbúgvar hava ivalcyst av føstum og leysum útreiðslum at gjalda; men vísandi til, at tað er samtykt fyrr í tingsetuni at áleggja landsstýrinum at endurskoða lógarverk og reglugerðir um útvarp og sjónvarp, heldur nevndin tað vera skeivt at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

2. viðgerð 1. juni 1995. Málið fall við 4-0 atkvøðum.

167 Løgtingslóg um búskaparráð

Ár 1995, mikudagin 26. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um búskaparráð.

§ 1. Landsstýrið skipar búskaparráð við tí uppgávu at fylgja við búskaparligu gongdini í landinum, og at ráðgeva um búskaparlig viðurskifti.

§ 2. Ráðið hevur 5 limir. Landsstýrið setur limirnar eftir tilmæli frá setursráðnum á Fróðskaparsetri Føroya.

a) Ráðið hevur ein formansskap við 3 limum, sum allir skulu hava útbúgving sum búskaparfrøðingar.
b) Hinir 2 limirnir skulu hava serkunnleika innan umráðandi øki í búskapinum.

Stk. 2. Limirnir í búskaparráðnum, sum ikki mugu vera løgtings- ella landsstýrislimir, verða valdir fyri 3 ár í senn.

Stk. 3. Formansskapurin kann, har ráðið metir tað neyðugt við serkønari ráðgeving

lagtingslov om økonomisk råd.

§ 1. Landsstyret nedsætter et økonomisk råd, hvis opgave er at følge landets økonomiske udvikling, og at rådgive om økonomiske forhold.

§ 2. Rådet har 5 medlemmer. Landsstyret udnævner medlemmerne efter indstilling fra akademirådet på Færøernes Universitet.

a) Rådet ledes af et formandskab med 3 medlemmer, som alle har uddannelse som økonomer.
b) De andre 2 medlemmer skal have specialkundskab indenfor betydningsfulde områder i økonomien.

Stk. 2. Medlemmerne i det økonomiske råd, som ikke må være lagtings- eller landsstyremedlemmer, bliver valgt for 3 år ad gangen.

í viðgerð av einum evni, økja um limatalið í ráðnum til hetta endamál.

§ 3. Búskaparráðið kemur saman minst tvær ferðir um árið eftir avgerð formansskapsins ella eftir áheitan frá hinum 4 limunum í ráðnum.
Stk. 2. Eftir umrøðu í ráðnum gevur formansskapurin út minst eina ferð um árið frágreiðing um gongdina í føroyska búskapinum, har mett verður um búskaparligu støðina, útlitini framyvir og hvørji tiltøk eiga at verða framd. Formansskapurin kann saman við frágreiðingini geva ein samandrátt av limanna sjónarmiðum, sum koma fram í umrøðuni. Formansskapurin hevur ábyrgdina av frágreiðingini.
Stk. 3. Limirnir í ráðnum hava tagnarskyldu um tað, sum teir fáa at vita sum limir í ráðnum og sum eftir sínu náttúru ikki eigur at verða borið víðari.
Stk. 4. Ráðið kann gera avtalu við stovnar/persónar um hjálp til kanningararbeiði fyri ráðið.

§ 4. Búskaparráðið setur ein skrivara og/ella avtala verður gjørd við stovn um umsitingina av ráðnum. Uppgávan hjá umsitingini verður at gera kanningar og frágreiðingar, sum eru neyðugar fyri, at ráðið kann loysa sínar uppgávur.
Stk. 2. Samsýning til ráðslimirnar skal góðkennast av landsstýrinum.

§ 5. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um starv ráðsins.

§ 6. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 3. Formandskabet kan, hvor rådet vurderer det nødvendigt med særlig rådgivning under behandling af et emne, øge medlemstallet i rådet til dette formål.

§ 3. Det økonomiske råd kommer sammen mindst to gange om året efter formandskabets bestemmelse, eller efter anmodning fra de andre 4 medlemmer i rådet.
Stk. 2. Efter drøftelse i rådet udgiver formandskabet mindst en gang om året en redegørelse om udviklingen i den færøske økonomi, med en vurdering af den økonomiske situation, de fremtidige udsigter og hvilke tiltag, der bør sættes i værk. Formandskabet kan lade redegørelsen ledsage af et referat af synspunkter, fremført af medlemmer under rådets drøftelser. Formandskabet har ansvaret for redegørelsen.
Stk. 3. Medlemmerne i rådet har tavshedspligt om det de får at vide som medlemmer i rådet og som efter sagens natur ikke bør videregives.
Stk. 4. Rådet kan lave aftale med institutioner/enkeltpersoner om hjælp til undersøgelser for rådet.

§ 4. Det økonomiske råd ansætter en sekretær og/eller laver aftale med en institution om administrationen af rådet. Administrationens opgave er at foretage undersøgelser og udarbejde redegørelser, som er nødvendige for, at rådet kan løse sine opgaver.
Stk. 2. Godtgørelse til rådsmedlemmerne skal godkendes af landsstyret.

§ 5. Landsstyret kan fastsætte nærmere bestemmelser om rådets virksomhed.

§ 6. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Við uppskotinum ynskir landsstýrið aftur at seta eitt búskaparráð við lóg. Landsstýrið heldur tað vera av stórum týdningi at fáa regluligar frágreiðingar frá føroyskum búskaparfrøðingum, bæði um gongdina í føroyska búskapinum og um hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk. Við at seta ráðið við lóg tryggjar ein ráðnum sjálvstøðuga støðu sum tað sitandi landsstýrið ikki kann broyta uttan at fara í tingið.

Viðmerkingar til einstøku greinirnar:

Til § 2: Ráðið telur 5 limir. Setursráðið á Fróðskaparsetri Føroya skal geva tilmæli um minst 4 limir til formansskapin, og minst 3 limir til restina av ráðnum, so landsstýrið hevur ein valmøguleika. a) Ráðið skal vera undir leiðslu av einum formansskapi, sum telur 3 limir. Limirnir í formansskapinum skulu hava útbúgving sum búskaparfrøðingar á akademiskum støði, og helst við ymiskum royndum. b) Hinir 2 limirnir í ráðnum eiga at verða valdir soleiðis, at teir tilføra ráðnum vitan innan týðandi samfelagsøkir í búskapinum, sum t.d. fiskivinnuna, fíggjarvinnuna, handilsvinnuna, arbeiðsmarknaðin, tað almenna og livikor borgaranna. Tað er tískil ikki neyðugt, at hesir limirnir eru búskaparfrøðingar, men heldur, at teir hava eina breiða fakliga vitan um sítt øki, umframt búskaparligt innlit á økinum.

Í Danmark verður tað nógv brúkt at seta fólk frá universitetunum í nevndir v.m. Fróðskaparsetur Føroya er ikki nóg stórur stovnur til, at hetta letur seg gera. Tí verður í lógini ásett, at setursráðið á Fróðskaparsetri Føroya í staðin ger tilmæli til landsstýrið um limirnar í ráðnum.

Við tað at teir tríggir limirnir í formansskapinum skulu hava endaligu ábyrgdina av frágreiðingunum, eiga teir at vera so óheftir av politiskum myndugleikum og serháhugamálum, sum praktiskt møguligt.

Hinir tveir limirnir hava í høvuðsheitum til uppgávu at tryggja ráðnum innlit í tey øki, teir starvast innan fyri ella hava serliga vitan um. Hesir limir kunnu tí væntast at hava sítt dagliga yrki í peningastovnunum, í øðrum privatum fyritøkum ella innan miðfyrisitingina. Tað er tó sera umráðandi, at hesir 2 limirnir í ráðnum ikki eru settir at umboða sína vinnugrein ella stovn, men at veita ráðnum tann serkunnleika teir hava innan sítt øki.

Til § 3: Formansskapurin hevur ábyrgdina av frágreiðingum frá ráðnum, sum í minsta lagi skal gerast eina ferð um árið. Frágreiðingar skulu leggjast fyri ráðið til umrøðu. Formansskapurin fær á henda hátt høvi til at fáa vitan um gongdina í ymsum pørtum av samfelagnum, uttan tó at vera bundin at fylgja teim áskoðanum, ið hesir limir hava.

Til § 4. Farnu árini hevur húskaparráðið í høvuðsheitum bert virkað sum ráðgevi í teimum førum, har landsstýrið ella fíggjarnevndin hevur heitt á ráðið at viðgera ymisk evni. Tað hevur ikki havt tøka arbeiðsorku til av egnari megi at gera metingar og frágreiðingar, sum landsstýrið eins og andstøða og almenningurin sum heild kunnu fáa

gleði av. Fyri at geva út regluligar frágreiðingar er tað neyðugt, at ráðið hevur ein skrivara við neyðugum førleika og tíð til at gera hetta drúgva arbeiði. Búskaparráðið fer ikki at virka eftir ætlan uttan so, at peningur verður settur av til at røkja skrivarauppgávuna, t.v.s. at ráðið setur ein skrivara ella ger avtalu við stovn um at røkja hesa uppgávu. Skrivarauppgávan er sera tíðarkrevjandi og krevur gott fakligt og praktiskt innlit, og ráðið sjálvt kann ikki røkja skrivarauppgávuna, tí limirnir vilja altíð verða full upptiknir av at røkja teirra høvuðsstarv. Mett verður, at skrivarauppgávan, samsýning til ráðslimirnar, leiga/keyp av útgerð v.m. fer at kosta uml. 450.000 kr. árliga.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 26. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 2. mai 1995 beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Jóanues Eidesgaard, landsstýrismann.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariassen, Kristian Magnussen og Finnbogi Ísakson) tekur undir við málinum, men mælir tó til, at ráðið í staðin fyri formansskap skipar seg við einum formanni, sum skal vera ein av búskaparfrøðingunum.

Meirilutin heldur eisini, at búskaparfrøðingarnir ikki eiga at hava leiðindi størv innan miðfyrisitingina ella umboða serálugamál í dagliga starvi sínum. Samsvarandi hesum viðmerkingum setir meirilutin fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í uppskoti landsstýrisins verða gjørdar hesar broytingar:

Pkt. 1.
§ 2, a verður soljóðandi:
Ráðið skipar seg við formanni. Formaðurin og tveir av hinum limunum skulu hava úthúgving sum búskaparfrøðingar. Hesir tríggir mugu ikki hava leiðandi størv innan

Pkt. 1.
§ 2, a formuleres således:
"Rådet ledes af en formand. Formanden og to af de øvrige medlemmer skal have uddannelse som økonomer. Disse tre må ikke være ansat i ledende stillinger i centraladministrationen, og må ikke repræ-

miðfyrisitingina, og mugu ikki umboða seráhugamál í dagliga starvi sínum.

Pkt. 2.
Í § 2, stk. 3 verður "Formansskapurin" broytt til "Formaðurin".

Pkt. 3.
Í § 3, stk. 1 verður "eftir avgerð formansskapsins" broytt til "eftir avgerð formansins" og "eftir áheitan frá hinum 4 limunum" verður broytt til "eftir áheitan frá 3 limum".

Pkt. 4.
§ 3, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Eftir umrøðu í ráðnum gera búskaparfrøðingarnir minst eina ferð um árið frágreiðing um gongdina í føroyska búskapinum, har mett verður um búskaparligu støðuna, útlitini framyvir og hvørji tiltøk eiga at verða framd.

Búskaparfrøðingarnir kunnu saman við frágreiðingini geva ein samandrátt av limanna sjónarmiðum, sum koma fram í umrøðuni.

Búskaparfrøðingarnir hava ábyrgdina av frágreiðingini."

sentere særinteresser i deres daglige stilling.

Pkt. 2.
I § 2, stk. 3 ændres "Formandsskabet" til "Formanden".

Pkt. 3.
I § 3, stk. 1 ændres "efter formandsskabets bestemmelse" til "efter formandens bestemmelse" og "efter anmodning fra de andre 4 medlemmer" til "efter anmodning fra 3 medlemmer".

Pkt. 4.
§ 3, stk. 2 formuleres således:
"Efter behandling i rådet skal økonomerne mindst en gang om året redegøre om udviklingen i den færøske økonomi, med en vurdering af den økonomiske situation, de fremtidige udsigter og hvilke tiltag der bør iværksættes.

Økonomerne kan sammen med redegørelsen give et resumé af medlemmernes synspunkter, som fremgår af rapporten.

Økonomerne har ansvaret for redegørelsen."

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Tordur J. Niclascu) hevur hesar viðmerkingar:

Vit hava onga lóg um búskaparráð, og tí er rætt at fáa lógarfest hetta virksemi.

Fyriliggjandi uppskot gongur út uppá at fáa eitt ráð, sum er óheft av landsstýrinum.

Um hetta er so avgerandi, og um hetta er gjørligt kann altíð tjakast um, men eitt er vist, at tað verður ógvuliga trupult at skipa eitt heilt óheft búskaparráð, og tað kemur eisini at kosta nógv meira.

Tá vit fyri einum ári síðani viðgjørdu henda sama spurning, førdi meirilutin fram, at tað er neyðugt at meta um kostnaðin. tí skal arbeiðið gerast heilt frá botni av, og av fólki, sum dagliga onki hevur við slíkar spurningar at gera (óheftir) og so má nógv gerast av nýggjum, sum kanska longu er gjørt av øðrum, sum í sínum dagliga yrki hava brúk fyri hesum upplýsingunum.

Minnilutin fer tí einaferð enn at seta fram viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 177/1993: Løgtingslóg um búskaparráð:

"Ein minniluti (Anfinn Kallsberg og Tordur J. Niclasen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, tá hendan lógin als ikki fæst at virka, og tí at kostnaðurin av tí, sum veruliga liggur í uppskotinum, verður ómøguligur at meta um. Landsstýrið eigur tí heldur at bøta um ta skipan, ið vit hava í dag. Sum nú er, eru tað fíggjarstjórin í Tinganesi, landsbankastjórin og stjórin á Hagstovuni, sum manna búskaparráðið. Hesir sita í fíggjarligu lívsæðrum í Føroyum og skuldu havt allar møguleikar at fylgt við øllum, sum fer fram á hesum øki. Sambært § 1 skal ráðið minst tvær ferðir um árið geva frágreiðing um gongdina í føroyska búskapinum, har mett verður um búskaparligu støðuna. Verandi búskaparráð skuldi havt allar møguleikar at framt hetta. Viðvíkjandi seinna partinum í § 1 um "útlitini framyvir og hvørji tiltøk eiga at verða framd" eigur eitt annað forum at verða tikið við. Her er tað fyrst og fremst vinnan, fakfeløg og peningastovnar, ið eiga at verða tikin við. Tí verður mælt til, at sett verður eitt búskaparsamskipannarráð, sum skal ráðgeva politisku myndugleikunum um framtíðartiltøk.

Út frá hesum setir minnilutin fram soljóðandi

u p p s k o t

til

samtyktar

Føroya landsstýrið velur búskaparsamskipannarráð, umboðandi vinnufeløgini, verkafeløgini og peningastovnarnar, sum saman við verandi búskaparráð skulu meta um útlitini framyvir og ráðgeva, hvørji tiltøk eiga at verða framd.

2. viðgerð 26. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Við atkvøðugreiðsluna 29. mai 1995 varð uppskot landsstýrisins sum broytt av meirilutanum í nevndini samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskot minnilutans fall við 11-0 atkvøðum.

Lóg nr. 120 frá 12. juli 1995.

FL jnr. 2513-4/94.

168 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

Ár 1995, mikudagin 26. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 129 frá 4. marts 1993, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"**Stk. 2.** Persónar, sum eru 67 ár ella eldri, rinda einki í grunnin. Arbeiðsgevarar, sum eru 67 ár ella eldri og hava fólk í vinnu, rinda tó grunninum árliga ½% av útgoldnum A-inntøkum. Arbeiðsgevarar rinda ikki gjald fyri løn hjá útlendingum undir FAS skipanini."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejdsmarkedspension.

§ 1.

I lagtingslov nr. 39 af 7. maj 1991 om arbejdsmarkedspension, som senest ændret ved lagtingslov nr. 129 af 4. marts 1993 foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 2 affattes således:

"**Stk. 2.** Personer, der er 67 år eller derover, indbetaler ikke til fonden. Arbejdsgivere, som er 67 år eller derover og har folk i arbejde, indbetaler dog til fonden årligt ½% af udbetalte A-indkomster. Arbejdsgivere betaler ikke ind til fonden af løn hos udlændinge under FAS ordningen."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

FAS-skipanin hevur ikki virkað eftir ætlan m.a. av tí, at skipaánarar hava verið skyldugir at rinda gjald til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin fyri løn hjá útlendingum. Við omanfyri nevnda broytingaruppskoti skuldi hesin meinbogi verið beindur burtur.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í arbeiðsmálanevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er framlagt av landsstýrinum tann 26. apríl 1995. Við 1. viðgerð 2. mai 1995 varð málið beint í arbeiðaramálanevndina.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið og tekur **ein samd nevnd** undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 22. mai 1995. Uppskotið samtykt við 24-0 atkvøðum.

3. viðgerð 29. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

Lóg nr. 71 frá 13. juni 1995.

169 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1995, mikudagin 26. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 63 a verða stk. 3, 4 og 5 strikað.
2) Í § 63 a verður sum nýtt stk. 3 sett:
   "**Stk. 3.** Føroya Landsstýri ásetur í kunngerð afturberingarprosentið, og kann við kunngerð áseta nærri reglur

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 fra 1. september 1993 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 63 a ophæves stk. 3, 4 og 5.
2) I § 63 a indsættes som nyt stk. 3.
   "**Stk. 3.** Færøernes Landsstyre fastsætter i bekendtgørelse refusionsprocenten, og kan i bekendtgørelse fastsætte nærmere bestemmelser ved-

fyri skip, sum koma undir ta í stk. 1 nevndu skipan".

3) Stk. 6 verður hereftir stk. 4.

§ 2

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er galdandi frá 1. januar 1995.

rørende skibe, som omfattes af bestemmelserne i den i stk. 1 nævnte ordning".

3) stk. 6 bliver herefter stk. 4.

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter at den er bekendtgjort, og har gyldighed fra 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt viðvíkur broyting í heimildini til at áseta afturberingarprocentið, sum verður borið reiðaravirkinum aftur, um skip teirra er skrásett undir FAS.

Fyriliggjandi uppskot ásetur, at Føroya Landsstýri verður heimilað við kunngerð at áseta afturberingarprocentið, og at ásetingin ikki verður tíðaravmarkað fyri eitt ár, sum í núgaldandi lóg.

Eftir galdandi lóg ásetur Líkningarráð Føroya í kunngerð afturberingarprocentið fyri næstkomandi ár í seinasta lagi 1. novembur á hvørjum ári.

Broytingin merkir, at tað verður ein størri stabilitetur í skattaviðurskiftunum hjá umrøddu reiðaravirkjum, um so er, at afturberingarprocentið ikki verður broytt frá ári til ár. Hetta kundi eisini verið við til at økt áhugan hjá t.d. útlendskum reiðaravirkjum, at koma undir FAS-skipanina.

Orsøkin til at hetta nú stingur seg upp er, at núgaldandi lóg ásetur eitt fast afturberingarprosent uppá 28% fyri 1992 og 1993, men at Líkningarráð Føroya hereftir skal áseta prosentið eftir ávísum lógarásetingum fyri inntøkuárið 1994 og framyvir. Í § 63 a, stk. 3 í skattalógini er ásett, at tann árliga afturberingin skal verða roknað við atliti til skattaprosentið undanfarna inntøkuár hjá teimum løntakarum, ið sama inntøkuár fingu inntøku umborð á skipum, sum eru skrásett í FAS.

Tann árliga ásetingin av afturberingarprosentinum, ið skal roknast sum omanfyri nevnt, kann føra ótryggleika við sær, tá reiðaravirkini undir FAS ikki kunnu verða fullvís í, at afturberingarprocentið framyvir fer at verða á stødd við prosentið undanfarin ár.

Við løgtingslóg nr. 178 frá 18. desember 1992, er broyting gjørd í § 8 í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan, og er henda broyting galdandi frá 1. januar 1993. Broytingin ber við sær, at persónar, sum eru undir avmarkaðari skattskyldu í Føroyum, og eru við skipi skrásett í FAS, skulu gjalda 35% í skatti av bruttoinntøkuni, sum stavar frá virksemi umborð á skipi skrásett í FAS. Skattaprosentið er sostatt lægri enn hjá øðrum avmarkað skattskyldugum persónum, sum gjalda 42% av bruttoinntøkuni.

Umboð fyri reiðararnar hava annars gjørt vart við ymsar aðrar trupulleikar, sum forða fyri, at fleiri skip verða skrásett í FAS. Ein av trupulleikunum er, at reiðarí, sum bert hava útlendingar umborð, skulu gjalda til arbeiðsmarknaðarreftirlønargrunnin, ALS og trygdargrunnin. Hetta metir umboðið fyri reiðararnir ikki vera rætt, tí hesi reiðarí ongan fyrimun fáa av omanfyri nevndu gjøldum.
Árliga gjaldið hjá arbeiðsgevaranum til:
- arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin er 0,5 % av útgoldnu A-inntøkunum
- arbeiðsloysistryggingina er 2,75 % av útgoldnu A-inntøkunum
- trygdargrunnin er hægst 0,01 % av útgoldnu A-inntøkunum

Hesir trupulleikar ávirka tó ikki tí skattligu síðuna av FAS-skipanini.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 26. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 2. mai 1995 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Vilhelm Johannesen Karl Robert Johansen og Jørgen Niclasen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja tað. Meirilutin viðmerkir, at tá hugsað verður um stabilitetin, so eigur afturberingarprosentið møguliga at verða ásett í sjálvari lógini og ikki í kunngerð við heimild í lóg.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson) viðmerkir, at § 63 a eigur ikki at standa í skattalógini, men FAS-skipanin eigur at gerast í sjálvstøðugari lóg, tí hetta er ein studningur til reiðaríini.

Minnilutin tekur ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 21-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 62 frá 13. juni 1995.

FL jnr. 2540-5/91.

170 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning

Ikki framlagt.

171 Stovnsetan av einum nýggjum føroyskum banka

Ár 1995, mikudagin 26. apríl legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur Føroya landsstýri at taka neyðug stig til, at fáa sett á stovn ein banka aftrat í Føroyum.

Viðmerkingar

Havandi tað í huga,ið fram er farið viðvíkjandi teimum føroysku bankunum og tað stríð, ið tók seg upp um hetta mál og hvørjir samfelagstrupulleikar hava staðist av hesum, loyva vit okkum at leggja hetta uppskot fram á tingborð.

Tað hava verið nógv dømi samb. fjølmiðlunum um, at Føroya Banki hevur avvíst umsóknum við teirri grundgeving, at uppskotini eftir meting bankans ikki hava verið nóg burðardygg.

Metingar bankans eru møttar við ivasemi og undran. Ilesar svartskygdu metingar eru alsamt aktuellar d.d., hóast løgtingið og danska stjórnin hava viðtikið lógir og tilskotsskipanir, sum sæð út frá einum privatfíggjarligum og banka sjónarmiði høvdu kunnað gjørt ætlanina burðardygga.

Løgtingið og harvið eisini samfelagið alt leita við ljós og lykt eftir fólki, sum hava dirvi, áræði, evni og ágrýtni til at stovna nýggj arbeiðsskapandi tiltøk. Fyri einaferð skuld tykist at vera til staðar tann politiski viljin til veruliga at hjálpa tílíkum tiltøkum og ikki bara at vera tóm orð. Gjørdar eru ítøkiligar lógir. Her verður hugsað um m.a. framtaksstovnin, tilskot til fløgur og tilskot til lønir v.m.

Treytirnar eru tó fyri at fáa lut í hesum tilskots- og stuðulstiltøkum, at stigtakarar kunnu fáa lutvísa fígging úr Føroya Banka. Her verður bert nevndur Føroya Banki við vilja. Hinir peningastovnarnir - t.v.s. Sparikassarnir - hava ikki tær fíggjarligu royndirnar og heldur ikki aðrar royndir til at viðgera størri projekt.

Sum omanfyri sagt, metir Føroya Banki ikki teir vinnulívsskapandi møguleikarnar á ein slíkan hátt, at teir kunnu vera grundarlag fyri játtan av lánum. Hetta er eisini galdandi í teimum førum, har vandin hjá bankunum fyri at vera við í projektinum, av neutralum eygleiðarum verður mett sum minimalur.

Tá ið tann einasti veruligi bankin mótarbeiðir ætlan løgtingsins og vinnulívsmanna um arbeiðsskapandi framtøk og púra niðurbindir samfelagið, er tað uppá tíðina, at aðrir lánimøguleikar verða fingnir til vega í tí føroyska samfelagnum.

Tí leggur Kristiligi fólkaflokkurin fram uppskot til samtyktar, um at seta á stovn ein nýggjan vinnulívsbanka í Føroyum.

Álagt verður Føroya landsstýri, at seta ein part av tí neyðuga byrjanarkapitalinum í tann nýstovnaða bankan.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 26. apríl 1995 og varð undir 1. viðgerð 2. mai 1995 beint í fíggjarnevndina.

Ein samd nevnd ásannar, at tað er óheppið, at vit bert hava ein virkandi banka í Føroyum.

Fíggjarnevndin heldur tó ikki, at tað er uppgávan hjá tí almenna at stovnseta fleiri bankar. Víst verður á, at privatar kreftir hava í hyggju at seta nýggjan banka á stovn.

Ein samd fíggjarnevnd mælir tinginum frá at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 19. mai 1995. Málið fall við 3-0 atkvøðum.

172 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1995, mikudagin 26. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslógum broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd hendan broyting:
Í § 30 verður stk. 2 orðað soleiðis:
"**Stk. 2.** Hevur felag v.m. ikki goldið afturbildna avgjaldið sambært stk. 1, verður renta at rokna við 1% um mánaðin frá 1. í tí mánaði, sum kemur aftan á at avgjaldið skuldi verið goldið sambært stk. 1, og til goldið er. Rentan kann ikki verða frádrigin, tá skattskylduga inntøka felagsins verður uppgjørd. Reglurnar í § 135, stk. 3 um rættin til at panta avgjaldið er eisini galdandi í hesum føri. Tann, ið hevur móttikið vinningsbýti, hevur skyldu til persónliga at rinda ta avgjaldsupphædd, sum vantar í aftaná panting av felagnum. Reglurnar í § 135, stk. 3 um rættin til at panta avgjaldið er eisini galdandi í hesum føri."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir at hon er kunngjørd, og er galdandi fyri tær upphæddir, sum verða útgoldnar í tí roknskaparskeiðnum, sum fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum 1995.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:
I § 30 affattes stk. 2 således:
"**Stk. 2.** Har et selskab m.v. ikke indbetalt den tilbageholdte afgift iflg. stk. 1 påløber der afgiften renter med 1 % månedlig fra 1. i måneden, der begynder efter at betalingen skulle være foretaget iflg. stk. 1, til afgiften er betalt. Disse renter kan ikke fradrages ved opgørelsen af selskabets skattepligtige indkomst. Afgiften kan gøres til genstand for udpantning efter reglerne i § 135, stk. 3. Den, som har modtaget udbytte, har pligt til personligt at betale det afgiftsbeløb, som ikke kan inddrives ved udpantning af selskabet. Reglerne i § 135, stk. 3, om retten til udpantning gælder også i dette tilfælde."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen, og gælder for de beløb, som bliver udbetalt i den regnskabsperiode, der er sammenfaldende med eller slutter i kalenderåret 1995.

Viðmerkingar:

Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt viðvíkur avgjaldinum uppá 35% til landskassan, ið eitt felag, sum útlutar vinningsbýti, skal halda aftur.

Fyriliggjandi uppskot ásetur, at um felagið av einari ella aðrari orsøk ikki rindar avgjaldið, hevur tann, ið hevur móttikið vinningsbýti, persónliga skyldu til at rinda ta avgjaldsupphædd, sum Føroya Gjaldstova ikki fær inn frá felagnum. Hetta vil í mongum førum forða fyri, at vinningsbýti verður útgoldið, uttan at avgjaldið samstundis verður goldið Føroya Gjaldstovu.

Orsøkin til, at hetta nú stingur seg upp er, at í higartil galdandi reglum er tað bert felagið, sum hevur ábyrgd av, at 35 % avgjaldið verður goldið. Hetta hevur í mongum føri havt við sær, at vinningsbýti hevur verið útgoldið av felagnum, uttan at avgjaldið hevur verið goldið til Føroya Gjaldstovu. Tá so gjaldstovan hevur gjørt kravið galdandi, er felagið tømt ella farið/koyrt á húsagang, og landskassin hevur mist sín peníng. Hetta er tó ikki galdandi fyri "seriøs" partafeløg v.m., men ofta verður hetta roynt, tá felagið er við at koma í fíggjarligar trupulleikar, ella sum rein spekulatión í hesi reglu.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í skattanevndina.

Ikki liðugt avgreitt.

173 Løgtingslóg um at avmarka møguleikarnar hjá skuldarum at taka lut í almennum útbjóðingum

Ár 1995, hósdagin 27. apríl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um at avmarka møguleikarnar hjá skuldarum at taka lut í almennum útbjóðingum.

§ 1. Lógin er galdandi í sambandi við almenna ella bundna útbjóðing hjá øllum pørtum av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum.
Stk. 2. Við falna almenna skuld skilst í hesi lóg, at ein, ið býður, ikki hevur goldið falnan skatt, avgjøld o.l. til tað almenna, sambært lóggávuni í Føroyum ella tí landinum ið tann, sum býður, hevur virki.

§ 2. Ein almennur myndugleiki, ið býður út arbeiði, keyp av vørum ella tænastum, skal í útbjóðingarkunngerðini ella í útbjóðingartilfarinum krevja, at øll, ið bjóða, samstundis sum boðið verður latið inn, vátta við trú og heiður, í hvønn mun viðkomandi hevur falna almenna skuld.
Stk. 2. Ein almennur myndugleiki má ikki taka við einum boði frá einum, ið býður, sum ikki hevur givið ta í stk. 1 nevndu váttan, ella, sum hevur meira enn kr. 100.000,- í falnari almennari skuld.
Stk. 3. Ein almennur myndugleiki kann kortini taka við einum boði frá einum, ið býður, sum hevur falna almenna skuld, um so er, at øll, ið bjóða og lúka treytirnar í útbjóðingarkunngerðini ella útbjóðingartilfarinum, hava meira enn kr. 100.000,- í falnari almennari skuld.

lagtingslov om begrænsning af skyldneres muligheder for at deltage i offentlige udbudsforretninger.

§ 1. Loven gælder i forbindelse med udbudsforretninger hos alle dele af den offentlige forvaltning under hjemmestyret.
Stk. 2. Ved gæld til det offentlige forstås i denne lov, at en tilbudsgiver ikke har betalt forfalden skat, afgifter o.l. til det offentlige i henhold til lovgivningen på Færøerne eller det land tilbudsgiveren er etableret.

§ 2. En offentlig myndighed, der udbyder arbejde, indkøb af varer eller tjenesteydelser, skal i udbudsbekendtgørelsen eller i udbudsmaterialet kræve, at enhver tilbudsgiver samtidig med afgivelsen af tilbuddet afgiver en erklæring på tro og love om, i hvilket omfang vedkommende har forfalden gæld til det offentlige.
Stk. 2. En offentlig myndighed må ikke antage et tilbud fra en tilbudsgiver, der ikke har afgivet den i stk. 1 nævnte gældserklæring, eller som har forfalden gæld til det offentlige, der overstiger kr. 100.000,-
Stk. 3. En offentlig myndighed kan dog antage et tilbud fra en tilbudsgiver, som har forfalden gæld til det offentlige, hvis samtlige tilbudsgivere, der opfylder betingelserne i udbudsbekendtgørelsen eller udbudsmaterialet, har forfalden gæld til det offentlige, der overstiger kr. 100.000,-

Stk. 4. Ein almennur myndugleiki kann harumframt taka við einum boði frá einum, ið býður, sum hevur meira enn kr. 100.000,- í falnari almennari skuld, um so er, at viðkomandi setir trygd fyri gjaldingini av tí partinum, ið er omanfyri kr. 100.000,-.

Stk. 5. Sama hvussu stór skuldin er, kann almennur myndugleiki útihýsa einum, ið býður, frá at luttaka í útbjóðingini vísandi til, at viðkomandi hevur falna almenna skuld.

§ 3. Er ikki harðari revsing áseett sambært lóggávuni annars, verður ein, ið býður, revsaður við bót, sum gevur óbeinar ella villleiðandi upplýsingar, sambært § 2, stk. 1.

Stk. 2. Ein almennur myndugleiki, ið brýtur § 2, stk. 1 og 2 verður revsaður við bót.

Stk. 3. Fyri brot, sum gjørd verða av partafeløgum, lutafeløgum ella tilíkum, kann felagnum verða áløgd bót.

§ 4. Henda lóg fær gildi 1. juli 1995.

Stk. 4. En offentlig myndighed kan endvidere antage et tilbud fra en tilbudsgiver, som har forfalden gæld på over kr. 100.000,- til det offentlige, hvis vedkommende stiller sikkerhed for betaling af den del af gælden, der overstiger kr. 100.000,-

Stk. 5. Uanset gældens størrelse kan en offentlig myndighed udelukke en ordregiver fra at deltage i en udbudsforretning under henvisning til, at vedkommende har forfalden gæld til det offentlige.

§ 3. En tilbudsgiver, der afgiver urigtige eller vildledende oplysninger til det offentlige, jf. § 2, stk. 1, straffes med bøde, medmindre højere straf er forskyldt efter lovgivningen iøvrigt.

Stk. 2. En offentlig myndighed, der overtræder § 2, stk. 1 og 2, straffes med bøde.

Stk. 3. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, anpartsselskab, andelsselskab, eller lignende, kan der pålægges virksomheden som sådan bødeansvar.

§ 4. Denne lov træder i kraft 1. juli 1995.

Viðmerkingar:

Endamálið við hesum uppskoti er fyri ein part at effektivisera innheintingina av almennari skuld hjá vinnurekandi, og fyri ein part at avmarka møguleikan fyri kappingaravlagan millum vinnurekandi, ið ikki skylda til tað almenna og vinnurekandi, ið skylda til tað almenna.

Við hesum endamáli í byggju verður skotið upp, at almennir myndugleikar fáa skyldu at útihýsa vinnurekandi, ið skylda tí almenna meira enn kr. 100.000,- í skatti og gjøldum, frá at taka lut í almennum útbjóðingum.

Uppskotið fer at hava við sær, at tað fer at verða lættari hjá vinnurekandi, ið ikki hava almenna skuld, at fáa arbeiði, sum almennir myndugleikar bjóða út. Hesi vinnurekandi fara tí at kunna bøta um umsetningin. Hetta gongur ynskinum um, at vinnurekandi ikki skulu kunna fáa ein fyrimun í kappingini við at lata vera við at gjalda til tað almenna.

Fyri at henda skipanin ikki skal darva óneyðugt, verður kortini skotið upp, at ein almennur myndugleiki, ið býður út arbeiði og keyp av vørum, kann taka við einum boði, sjálvt um tann, ið býður, hevur stóra skuld til tað almenna. Tað er galdandi í førum, har øll, ið bjóða, skylda tí almenna meira enn kr. 100.000,-. Ein almennur myndugleiki, ið býður arbeiði út, fer somuleiðis at kunna taka við einum boði frá einum, ið býður, og hevur stóra almenna skuld, um so er, at viðkomandi í seinasta lagi, tá tikið verður við boðnum, setir trygd fyri, at tann parturin av skuldini, ið er omanfyri kr. 100.000,-, tá tikið verður við boðnum, verður goldin. Við hesum verður ein, ið býður, og hevur almenna skuld, ið eftir øllum at døma helst fer at verða goldin niður til kr. 100.000,- ella meira, um tikið verður við boðnum hjá honum, javnsettur við hini, ið bjóða. Um so er, at trygdin ikki er sett, tá boðið verður latið inn, má skuldarváttanin tó, við atliti at viðgerðini av boðunum, ið eru komin inn, verða send saman við eini fráboðan um, at trygd fer at verða sett.

Umframt hetta verður skotið upp, at møguleiki verður fyri - men ikki skylda - at útihýsa vinnurekandi, ið skylda minni enn kr. 100.000,- til tað almenna, frá at taka lut í útbjóðingum hjá almennum myndugleikum.

Uppskotið hevur sostatt við sær, at almennir myndugleikar sum meginregla hava skyldu at útihýsa teimum, ið bjóða og skylda meira enn kr. 100.000,- til tað almenna.

Landsstýrið hevur umhugsað, um hesar reglurnar eisini skulu fevna um avtalur, ið eru gjørdar, uttan útbjóðingarumfar hevur verið frammanundan. Um so var, hevði hetta fevnt um øll keyp, sum almennir myndugleikar gera. Hetta hevði tó ikki verið rímiligt og sera trupult at umsita. Landsstýrið hevur tí mett tað vera skilabest, bert at lata reglurnar fevna um beinleiðis útbjóðingar í fyrsta umfari.

Fíggjarligar og fyrisitingarligar avleiðingar.
Mett verður, at hesar ásetingar fara at fyribyrgja vøksturin av eftirstøðunum hjá vinnurekandi og í ein ávísan mun at hjálpa til at innheinta falna skuld. Tað ber tó ikki til at tilskila neyv tøl fyri hesum.

Mett verður ikki, at uppskotið fer at hava meinútreiðslur av týdningi við sær fyri fyrisitingina, ið ikki kunnu finnast innan fyri verandi játtan. Heldur ikki verður neyðugt við nýggjum normeringum fyri at umsita lógina.

Annars er ætlan landsstýrisins saman við gjaldstovuni at gera eitt vegleiðingarskriv til allar almennar myndugleikar um umsiting av lógini.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1:
ad stk. 1: Eftir hesi áseting er lógin galdandi fyri alla almenna fyrisiting, sum nevnd er í kap. 1 í fyrisitingarlógini. Hetta merkir, at umframt alla lands- og kommunala

fyrisiting, er lógin eisini galdandi fyri serlig ráð og nevndir. Sjálvsognarstovnar, felløg v.m., sum í størri mun útinna alment virksemi, og tí eru undir neyvari almennari regulering og eftirliti og harumframt møguliga móttaka almennan rakstrarstuðul, koma undir ásetingina um almenna fyrisiting.

Henda lóg fevnir um úbjóðingar, sum nevnt í løgtingslóg um útbjóðing, umframt keyp av vørum og tænastum, tá hesi verða boðin út á ein líknandi hátt, sum byggiarbeiði sambært løgtingslóg um útbjóðing v.m.

Hetta merkir hinvegin, at t.d. undirhondsboð frá hægst tveimum bjóðandi eru ikki fevnd av lógini.

ad stk. 2: Her verður ásett, hvat skilst við almenna skuld. Skotið verður upp, at lógin fevnir um tey almennu krøvini, sum vanliga koma í sambandi við útinning av vinnu. Onnur almenn skuld er ikki umfatað. Lógin fevnir heldur ikki um skuld, ið hevur samband við persónligu viðurskiftini hjá tí vinnurekandi.

Til § 2:

ad stk. 1: Skotið verður upp, at almennir myndugleikar, ið bjóða arbeiði, ella keyp av vørum og tænastum út, fáa skyldu at krevja upplýsing um, í hvønn mun tann, ið býður, hevur falna almenna skuld. Skuldin, ið upplýsast skal um, skal vera eftirstøður av ógoldnum, falnum skattum og gjøldum.

ad stk. 2-4: Hesar reglur hava við sær, at ein almennur myndugleiki, ið hevur valt at nýta útbjóðingarháttin, ikki má taka við einum boði, um so er, at tann, ið býður, ikki hevur latið ta kravdu váttanina, ið vísir, í hvønn mun hann hevur skuld til tað almenna.

Grundin fyri uppskotinum um, at boð frá teimum, ið hava ógoldna falna skuld til tað almenna, ið er størri enn kr. 100.000,-, skulu burturvísast, er atlitið at effektivitetinum av innheintingini.

Av tí, at tað kann koma fyri, at einasta boð, ið lýkur treytirnar í útbjóðingini, kemur frá einum, ið skyldar meira enn kr. 100.000,-, ella at allir, ið bjóða og lúka útbjóðingartreytirnar, skylda meira enn kr. 100.000,-, er neyðugt at hava møguleika fyri, at útbjóðarin í hesum førum kann taka við einum boði frá einum, ið skyldar tí almenna meira enn kr. 100.000,-.

Tikið kann somuleiðis verða við einum boði frá einum, ið skyldar meira enn kr. 100.000,- til tað almenna, um so er, at tann, ið býður, setir trygd fyri gjaldingini av tí partinum, ið er omanfyri kr. 100.000,-.

ad stk. 5: Harumframt verður skotið upp, at almennir myndugleikar, ið bjóða út, fáa møguleika, men ikki skyldu, at burturvísa boði frá teimum, ið hava almenna skuld, sama hvussu stór skuldin er. Við uppskotinum um, at almennur myndugleiki sum

úthjóðari ikki hevur skyldu at burturvísa skuldarum, ið hava minni enn kr. 100.000,- í almennari skuld, er endamálið við lógini um at effektivisera innheintingina rokkið á ein hátt, sum samstundis hevur fyrilit fyri møguleikunum hjá almennum myndugleikum at disponera, t.d. at keypa.

Til § 3:
ad stk. 1: Ásetingin gevur heimild at revsa tey, ið bjóða og geva óbeinar og villleiðandi upplýsingar í teirri kravdu váttanini um, í hvønn mun tann, ið býður, hevur almenna skuld omanfyri kr. 100.000,-

ad stk. 2: Eisini er heimild at áleggja almennum myndugleikum bót, um teir ikki fylgja ásetingunum. Teir almennu myndugleikar serliga hugsað er um, eru kommunur og sjálvsognarstovnar v.m., sum ikki eru beinleiðis undir landsstýrinum. Hinvegin er talan um stovnar beinleiðis undir landsstýrinum, er helst óneyðugt at nýta hesa heimild, tí møguligt at lata brot fáa tænastuligar fylgjur fyri viðkomandi ábyrgdarpersón.

ad stk. 3: Ásetingin gevur á vanligan hátt møguleika at áleggja løgfrøðiligum persónum sekt.

Til § 4:
Skotið verður upp, at lógin fær gildi 1. juli 1995.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 27. apríl 1995 og varð eftir 1. viðgerð tann 2. mai 1995 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur havt málið til viðgerðar og kann taka undir við grundregluni um at avmarka møguleikarnar hjá skuldarum at taka lut í útbjóðingum hjá tí almenna.

Ein samd rættarnevnd mælir tó til, at ávísar broytingar verða framdar í lógaruppskotinum, soleiðis at hetta verður meira greitt og einfalt og harvið lýkur treytirnar um ódýra og skynsama umsiting umfram grundsjónarmiðið um trygd og greiðan skilnað millum rættindi og skyldur hjá teimum, sum fevnd eru av lógini.

Rættarnevndin er av tí áskoðan, at sjálvt lógarheitið "almennar útbjóðingar" kann verða bæði misvísandi og óheppið.

Almennar útbjóðingar kunnu í vanligum týdningi skiljast sum allar útbjóðingar, sum t.d. standa í bløðunum ella verða bodnar út á annan hátt alment, uttan at tað almenna, t.v.s.

land og kommunur v.m. eiga nakran lut í hesi útbjóðing. Fyri at eingin misskiljing skal verða, verður skotið upp, at orðingin verður broytt til "útbjóðingum frá tí almenna, t.e. landi, kommunum, almennum stovnum, ráðum v.m.".

Sambært grein 1 er lógin avmarkað til at galda fyri almenna ella bundna útbjóðing, men ikki onnur tilboð, t.v.s. undirhondstilboð. Hetta tykist ikki sambærligt við sjálvt aðalmálið við lógini, nevniliga effektivt at skerja møguleikarnar hjá øllum skuldarum at bjóða upp á arbeiði, sum boðin verða út av tí almenna. Ei heldur er hetta í tráð við donsku orðingina í uppskotinum fyri somu lógargrein, har talan er um allar útbjóðingar uttan onnur fyrivarni. Grundstøðið fyri hesum lógaruppskoti, nevniliga danska lógin nr. 1093 frá 21.12.1994 nevnir ei heldur nakað tílíkt fyrivarni um, at framíhjátilboð skulu verða undantikin reglunum.

Skotið verður sostatt upp at broyta føroyska innihaldið í grein 1, stk. 1 samsvarandi danska tekstinum í hesi somu grein.

Í grein 1, stk. 2 verður gjørd ein útgreining av, hvat skilst við almenna falna skuld. Tað er í hesum sambandi vert at nevna, at talan skal verða um sonevnda nettoskuld og ikki bruttoskuld. Tað kemur nevniliga ofta fyri, at almennir myndugleikar skylda privatum pening, sum fallin er til gjaldingar. Ein slík eftirstøða má mótroknast í privatu skuldini, áðrenn tann í grein 1, stk. 3 tilskilaða skuldin verður uppgjørd.

Í grein 2 er nærri ásett, hvørjar reglur skulu verða fylgdar í sambandi við eina tílíka almenna útbjóðing. Um so er, at viðkomandi er í eftirstøðu við omanfyri kr. 100.000 í almennari skuld, verður hann útihýstur frá at luttaka í slíkum útbjóðingum.

Tó eru nakrar undantaksreglur, har tann privati í serstøkum førum kann fáa loyvi til at vera við í útbjóðingini, m.a. við at seta trygd.

Her kundi verið skoytt uppí, at tann arbeiðstakari, ið hevur gjørt eina afturgjaldsskipan og hevur hildið hesa skipan til fulnar, somuleiðis kann luttaka í útbjóðingini á jøvnum føti við aðrar arbeiðstakarar.

Innihaldið í stk. 5 í hesi lógargrein kann tykjast sera tilvildarligt og ivasamt, tá henda regla gevur tí almenna heimild til eftir egnari leysligari meting at gera av, um einstakur arbeiðstakari er verdur at luttaka í eini kapping um eitt alment arbeiði ella ikki, sama hvussu stór ella lítil skuldin er.

Umráðandi er at hava greiðar reglur, sum veita borgaranum vissu fyri, hvussu rættarstøðan er í landinum. Ein regla um at lata einstakar myndugleikar gera av, hvørt skuldin nú er av slíkum slagi ella støddi, at hetta forðar einum ella fleiri arbeiðstakarum at bjóða upp á ávíst arbeiði, er týðuliga merkt av tilvild og er løgfrøðiliga vandamikil. Verður ásetingin sett í gildi, so kann hon lættliga bera í sær beinleiðis misnýtslu og elva til órætt móti mongum av teimum, sum annars sambært høvuðsregluni høvdu havt møguleika fyri at fingið arbeiði.

Tá henda undantaksregla skjótt kann gerast høvuðsreglan og harvið undirgrava sjálva meginregluna í lógini, verður skotið upp, at hetta pkt. verður strikað.

Við hesi broyting mælir **ein samd rættarnevnd** løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Heitið á løgtingslógini verður broytt til:

"Løgtingslóg um at avmarka møguleikar hjá skuldarum at taka lut í útbjóðingum hjá tí almenna."

Grein 1 verður broytt til:

"Lógin er galdandi í sambandi við útbjóðingartilboð hjá øllum pørtum av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum."

"§ 1, stk. 1 Loven gælder i forbindelse med udbudsforretninger hos alle dele af den offentlige forvaltning under hjemmestyret."

Sum ískoyti í grein 2, stk. 4 verður sett: "ella sambært avtalu hevur gjørt eina afturgjaldsskipan við tað almenna, sum er hildin."

"§ 2, stk. 4 eller i henhold til aftale har indgået en tilbagebetalingsordning med det offentlige, som er overholdt."

Grein 2, stk. 5 verður strikað.

2. viðgerð 26. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Við atkvøðuðgreiðsluna 29. mai 1995 varð uppskotið við broytingunum frá rættarnevndini samtykt við 30-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Málið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

Lóg nr. 98 frá 20. juni 1995.

174 Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

Ár 1995, mikudagin 26. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 5, stk. 5 verður skoytt uppí aftaná "byrjar": "jb. tó § 23 a, stk. 8."
2) Í § 20, stk. 3 verður skoytt uppí aftaná "vikuna": "jb. tó § 23 a, stk.8."
3) § 23, stk. 2 verður strikað.
4) aftaná § 23 verður sum § 23 a sett:

"**§ 23 a.** Skrásett virki við ársfjórðingi sum avgjaldstíðarskeiði skulu hóast ásetingina í § 20 hava álmanakkamánaðin sum avgjaldstíðarskeið og lata inn uppgerð og harumframt rinda avgjaldið seinast 15 dagar aftaná, tá ið

1) virkið 2 ferð innan fyri teir seinastu 12 mánaðirnar ikki rættstundis hevur rindað avgjald ella
2) virkið er í eftirstøðu við avgjaldinum eftir hesi lóg við eini upphædd, ið er meira enn 25.000 kr. tilsamans, og
3) virki ikki rindar eftirstøðuna viðv. nr. 1 ella 2 áðrenn 10 yrkadagar frá móttøkuni av áminningarskrivi frá Toll- og Skattstovu Føroya, har virkið fær boð um, at um tað framvegis ikki rindar, verður virkinum álagt stytt avgjaldstíðarskeið v.m.

Stk. 2. Tað stytta avgjaldstíðarskeiðið eftir stk. 1 skal verða galdandi frá tí 1. í tí álmanakkamánaði, har freistin,

lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 foretages følgende ændringer:

1) I § 5, stk. 5 tilføjes efter "påbegyndes": "jf. dog § 23 a stk. 8."
2) I § 20, stk. 3 tilføjes efter "ugen": "jf. dog § 23 a, stk. 8."
3) § 23, stk. 2 udgår.
4) Efter § 23 indsættes som § 23 a:

"**§ 23 a.** Registrerede virksomheder med kvartalet som afgiftsperiode skal uanset bestemmelsen i § 20 anvende kalendermåneden som afgiftsperiode og indsende angivelse samt indbetale afgiften senest 15 dage derefter, når

1) virksomheden 2 gange indenfor de seneste 12 måneder ikke rettidigt har indbetalt afgift eller
2) virksomheden er i restance med afgift efter denne lov med et samlet beløb, der overstiger 25.000 kr. og
3) virksomheden ikke indbetaler restancer efter nr. 1 eller nr. 2 inden 10 hverdage fra modtagelsen af en erindringsskrivelse fra Toll- og Skattstovu Føroya, hvorved virksomheden underrettes om, at den ved fortsat manglende betaling pålægges forkortet afgiftsperiode m.v.

Stk. 2. Den forkortede afgiftsperiode efter stk. 1 skal anvendes med virk-

sum er ásett í stk. 1, nr. 3, er farin. Avgjaldið fyri eitt fyrri avgjaldstíðarskeið, sum ikki er latið inn ella goldið enn, skal latast inn og rindast samstundis við avgjaldinum fyri tað fyrsta stytta avgjaldstíðarskeiðið.

Stk. 3. Toll- og Skattstova Føroya kann frítaka einum virki frá styttum avgjaldstíðarskeiði v.m., um ein gjaldsavtala er gjørd, ið virkið heldur, ella um so er, at tað ikki í aðrar mátar við grundarlagi í viðurskiftunum hjá virkinum verður mett, at tørvur er á at áleggja virkinum stytt avgjaldstíðarskeið v.m.

Stk. 4. Toll- og Skattstova Føroya kann áleggja virkjum, ið vera fráboðað til skrásetingar, at nýta stytt avgjaldstíðarskeið v.m. eftir reglunum í stk. 1. Krav um stytt avgjaldstíðarskeið v.m. kann verða álagt, tá ið ein eigari av virkinum ella tann persónur, ið veruliga rekur virkið, og sum hevur tilknýti til eigaran á sama hátt, sum ásett í § 115, stk. 1, 2. pkt. í partafelagslógini, ella er limur í nevndini hjá virkinum ella stjórnini, innan fyri seinastu 5 árini hevur verið eigari av ella limur í nevndini ella stjórnini hjá einum øðrum virki, ið innan fyri hetta tíðarskeiðið ikki hevur goldið meirvirðisgjald rettstundis ella hevur verið í eftirstøðu. Er tann skrásetti eitt vinnufelag v.m, verður eisini ein persónur, ið eigur slíkar fíggjarpartar í avgjaldsskylduga virkinum, sum verða roknaðir sum partabrøv hjá høvuðspartaeigara sambært § 4 a, stk. 2-4 í virðisbrævaskattalógini, ella eitt vinnufelag v.m., sum eigur slíkar fíggjarpartar í avgjaldsskylduga virkinum. Stytt avgjaldstíðarskeið v.m. skal tó bert verða nýtt, tá tað eftir ítøkiligari metan verður mett at vera tørvur á hesum fyri at tryggja, at goldið verður rættstundis.

ning fra den 1. i den kalendermåned, hvor den i stk. 1, nr. 3, nævnte frist udløber. Afgiften for en tidligere afgiftsperiode, hvor afgiften endnu ikke er angivet og indbetalt, skal angives og indbetales samtidig med afgiften for den første forkortede afgiftsperiode.

Stk. 3. Toll- og Skattstova Føroya kan fritage en virksomhed for forkortet afgiftsperiode m.v., hvis der er indgået en betalingsordning, som virksomheden overholder, eller hvis der iøvrigt ikke på baggrund af virksomhedens forhold vurderes at være behov for at pålægge virksomheden forkortet afgiftsperiode m.v.

Stk. 4. Toll- og Skattstova Føroya kan pålægge virksomheder, der anmeldes til registrering, at anvende forkortet afgiftsperiode m.v. efter reglerne i stk. 1. Krav om forkortet afregningsperiode m.v. kan pålægges, når en ejer af virksomheden eller den person, der reelt driver virksomheden, og som er knyttet til ejeren på samme måde som fastsat i aktieselskabslovens § 115, stk. 1, pkt. 2, eller et medlem af virksomhedens bestyrelse eller direktion inden for de seneste 5 år har været ejer af medlem af bestyrelsen eller direktionen i en anden virksomhed, som inden for dette tidsrum ikke rettidigt har indbetalt afgift efter denne lov eller har været i restance. Er den afgiftspligtige et selskab m.v., anses som ejer også en person, der besidder sådanne kapitalandele, i den afgiftspligtige virksomhed, som henregnes til hovedaktionæraktier efter § 4 a, stk. 2-4 i virðisbrævaskattalógini, eller et selskab m.v., der besidder sådanne kapitalandele i den afgiftspligtige virksomhed. Forkortet afregningsperiode m.v. skal dog kun anvendes, når der efter et konkret skøn vurderes

Stk. 5. Virki kunnu í staðin fyri at nýta stytt avgjaldstíðarskeið v.m. sambært stk. 1 og 4 velja at seta trygd fyri eina upphædd, ið samsvarar við eftirstøðuna í avgjaldinum eftir hesi lóg, umframt væntað meðal avgjald fyri eitt 3 mánaða skeið. Trygdin skal setast fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið, og í hesum tíðarskeiði mugu nýggjar eftirstøður av avgjaldi eftir hesi lóg ikki koma. Um so er, at tað kemur nýggj eftirstøða, eftir at trygdin er sett, verður virkinum álagt stytt avgjaldstíðarskeið v.m. eftir stk. 1 og 4.

Stk. 6. Virkir, ið eftir stk. 1 og 4 eru áløgd stytt avgjaldstíðarskeið, kunna nýta vanligt avgjaldstíðarskeið v.m., tá ið virkið í einum 12 mánaða tíðarskeiði hevur goldið avgjald, og virkið ikki er í eftirstøðu av avgjaldi eftir hesi lóg.

Stk. 7. Toll- og Skattstova Føroya kann áleggja einum virki, ið ikki heldur krøvini um stytt avgjaldstíðarskeið v.m., at seta trygd. Trygdin skal vera sett fyri eina upphædd, ið samsvarar við upphæddina av eftirstøðuni hjá virkinum av avgjaldi eftir hesi lóg, umframt væntað avgjald fyri eitt 3 mánaða tíðarskeið. Trygdin skal setast seinast 8 dagar aftaná, at virkið hevur móttikið fráboðan um hetta, jb. stk. 9, tó kann freistin leingjast eftir áheitan. Virkir, ið seta tá kravdu trygd, skulu hóast stk. 1 og 4 ikki nýta stytt avgjaldstíðarskeið v.m. Trygd skal tó bert setast, tá ið tað eftir eini ítøkiligari metan verður mett, at kravið um stytt avgjaldstíðarskeið framhaldandi verður sett til viks v.m. hevur við sær, at vandi er fyri fíggjarligum tapi fyri landskassan.

Stk. 8. Toll- og Skattstova Føroya kann í staðin fyri at seta krav um stytt avgjaldstíðarskeið v.m. eftir stk. 4, áleggja virkjum, ið verða fráboðað til

at være behov herfor for at sikre rettidig indbetaling.

Stk. 5. Virksomheder kan istedet for at anvende forkortet afgiftsperiode m.v. efter stk. 1 og og 4 vælge at stille sikkerhed for et beløb, der svarer til den afgiftspligtige restance af afgift efter denne lov, med tillæg af det forventede gennemsnitlige tilsvar heraf for en 3-måneders-periode. Sikkerhed skal stilles for en 12-måneder periode, i hvilken der ikke må opstå nye restancer vedrørende afgift efter denne lov. Hvis der efter sikkerhedsstillelsen opstår en ny restance, pålægges virksomheden forkortet afgiftsperiode m.v. efter stk. 1 og 4.

Stk. 6. Virksomheder, der efter stk. 1 og 4 er pålagt forkortet afgiftsperiode m.v., kan anvende sædvanlig afgiftsperiode m.v., når virksomheden i en 12-måneders-periode rettidigt har indbetalt afgiften, og virksomheden ikke er i restance med afgift efter denne lov.

Stk. 7. Toll- og Skattstova Føroya kan pålægge en virksomhed, der ikke overholder kravene om forkortet afgiftsperiode m.v. at stille sikkerhed. Sikkerheden skal stilles for et beløb, der svarer til virksomhedens restance af afgift efter denne lov med et tillæg af det forventede tilsvar heraf i en 3-måneders periode. Sikkerheden skal stille senest 8 dage efter, at virksomheden har modtaget meddelelse herom, jf. stk. 9, idet fristen dog kan forlænges efter anmodning herom. Virksomheder, der stiller sikkerhed, skal uanset stk. 1 og 4 ikke anvende forkortet afgiftsperiode m.v. Sikkerhed skal dog kun stilles, når der efter et konkret skøn vurderes, at en fortsat tilsidesættelse af kravet om forkortet

skrásetingar, at seta trygd. Krav um trygd kann setast, tá ið eigari av virkinum, jb. her eisini stk. 4, ella tann persónurin, ið veruliga rekur virkið, og sum hevur tilknýti til eigaran á sama hátt sum í § 115, stk. 1, 2. pkt. í partafelagslógini, ella ein limur í nevndini ella stjórnini hjá virkinum, sum innan fyri tey seinastu 5 árini hevur verið eigari av ella limur í nevnd ella stjórn á øðrum skrásettum virki, ið er farið konkurs ella er vorðið insolvent, har Toll- og Skattstova Føroya hevur krøv, ið ikki eru nóg væl tryggjað, ella landskassin hevur havt 50.000 kr. ella meira tilsamans í tapi av avgjaldi eftir hesi lóg. Trygdin skal tó bert setast, tá ið tað eftir eini ítøkiligari metan verður mett at vera stórur váði fyri, at kravið um stytt avgjaldstíðarskeið v.m. eftir stk. 4 ikki er nóg mikið til at tryggja, at avgjald eftir hesi lóg verður goldið rættstundis. Trygd skal setast fyri eini upphædd, ið eftir metan Toll- og Skattstovu Føroya samsvarar við tað væntaða miðalavgjaldið í einum 3 mánaða tíðarskeiði. Tá ið virkinum verður álagt at seta trygd, kann virkið ikki skrásetast, fyrr enn kravið um hetta er eftirlíkað. Eitt krav um setan av trygd, skal fráboðast virkinum, seinast 14 dagar aftaná, at virkið hevur latið inn skrásetingarskjal.

Stk. 9. Krav um trygd eftir stk. 7 og 8 verður fráboðað virkinum við innskrivaðum brævi. Um kravið um trygd er sett fram eftir stk. 8 skal fráboðanin innihalda upplýsing um, at verður tann kravda trygdin ikki sett, hevur hetta við sær, at virkið ikki kann skrásetast, og tí verður revsivert at reka virkið sambært ásetingini í § 33, stk. 3. Krav um trygd heldur uppat, tá ið virkið í tí seinasta 12 mánaða tíðarskeiðnum hevur goldið

afregningsperiode m.v. indebærer en risiko for tab for landskassen.

Stk. 8. Toll- og Skattstova Føroya kan i stedet for at stille krav om forkortet afgiftsperiode m.v. efter stk. 4 pålægge virksomheder, der anmeldes til registrering, at stille sikkerhed. Krav om sikkerhed stilles, når en ejer af virksomheden, jf. herved også stk. 4, eller den person, der reelt driver virksomheden, og som er knyttet til ejeren på samme måde som fastsat i aktieselskabslovens § 115, stk 1, 2. pkt., eller et medlem af virksomhedens bestyrelse eller direktion, inden for de seneste 5 år har været ejer af eller medlem af bestyrelsen eller direktionen i en anden afgiftspligtig virksomhed, der er gået konkurs eller er blevet insolvent, hvorved Toll- og Skattstova Føroya har et ikke fuldt sikret tilgodehavende, eller landskassen er blevet påført et samlet tab på mere end 50.000 kr. vedrørende afgift efter denne lov. Sikkerhed skal dog kun stilles, når der efter et konkret skøn vurderes at være en nærliggende risiko for, at et krav om forkortet afregningsperiode m.v. efter stk. 4, ikke er tilstrækkeligt til at sikre, at tilsvar af afgift efter denne lov indbetales rettidigt. Sikkerhed skal stilles for et beløb, der efter Toll- og Skattstovu Føroya skøn svar til det forventede gennemsnitlige tilsvar af afgift efter denne lov, i en 3-måneders periode. Når virksomheden pålægges at stille sikkerhed, kan virksomheden ikke registreres, før dette pålæg er opfyldt. Et pålæg om sikkerhedsstillelse skal meddeles virksomheden senest 14 dage efter, at virksomheden anmeldes til registrering.

Stk. 9. Krav om sikkerhedsstillelse efter stk. 7 og 8 meddeles virksomheden ved anbefalet brev. Ved krav

avgjald eftir hesi lóg rættstundis og virkið ikki longur er í eftirstøðu."

5) Í § 33, stk. 3 verður skoytt uppí aftaná "2 ár":
"Við bót, hefti ella fongsul upp til 2 ár revsast eisini tann, ið við vilja ella av grovum óskotni rekur skrásetingarskyldugt virksemi, hóast virkinum er noktað skráseting eftir ásetingunum í § 23 a, stk 8."

§ 2

Henda lóg fær gildi 1. oktober 1995.

Stk. 2. Krav um trygd eftir ásetingunum kunnu gerast galdandi fyri nýggj virki, ið fráboðast til skráseting frá og við 1. oktober 1995.

om sikkerhedsstillelse efter stk. 8 skal meddelelsen indeholde oplysninger om, at undladelse af at stille den krævede sikkerhed indebærer, at virksomheden ikke kan registreres, hvorefter det vil være strafbart at drive virksomheden efter bestemmelsen i § 33, stk. 3. Krav om sikkerhedsstillelse ophører, når virksomheden i den seneste 12-månedersperiode har indbetalt afgift efter denne lov rettidigt, og virksomheden ikke længere er i restance."

5) I § 33, stk. 3 tilføjes efter "2 år":
"Med bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år straffes ligeledes den, der forsætligt eller groft uagtsomt driver registreringspligtig virksomhed, uanset at virksomheden er nægtet registrering efter § 23 a, stk. 8."

§ 2

Denne lov træder i kraft 1. oktober 1995.

Stk. 2. Krav om sikkerhed overfor nye virksomheder efter bestemmelserne, kan gøres gældende overfor virksomheder, der anmeldes til registrering fra og med den 1. oktober 1995.

Viðmerkingar:

Í 1994 hevði landskassin eitt staðfest tap uppá meirvirðisgjald kr. 2.086.688, og eitt væntað tap uppá kr. 21.113.467, so roknast kann við einum møguligum tapi uppá umleið kr. 23.200.000 tilsaman fyri 1994.

Eftirstøðan av meirvirðisgjaldi pr. 31.12.1994 var kr. 34.306.638.

Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald viðvíkur eini effektivisering av innkrevjingini av eftirstøðum av meirvirðisgjaldi við at stytta avrokningartíðarskeiðið og at skapa heimild at krevja trygd og nokta skráseting. Hetta fyri at minka um møguleikan fyri eftirstøðum og tapi fyri landskassan av meirvirðisgjaldi.

Sum støðan er í dag, hava virki, ið gjalda meirvirðisgjald til ásettu tíð, trupult við at kappast við tey virki, ið ikki gjalda meirvirðisgjald sum lógin ásetur. Hetta hevur við sær, at meirvirðisgjaldsskipanin, sum eigur at verða neutral, í veruleikanum ávirkar kappingarføri millum virkini. Sum sæst á omanfyrinevndu upphæddunum yvir

eftirstøður og tap av meirvirðisgjaldi, er hetta ein stórur trupulleiki, sum hert kann bøtast uppá við eini lógarbroyting.

Eftir uppskotinum fær tað avleiðingar eftir einum stiga, ið hevur trý stig, um skyldan, ið meirvirðisgjaldsskyldug hava at krevja meirvirðisgjald upp fyri landskassan, verður misnýtt.

Uppskotið umfatar bæði virki, ið eru í gongd, tað vil siga virki, sum eru skrásett, og nýggj virki, ið verða meldað til skrásetingar.

Fyrsta stig hevur við sær, at Toll- og Skattstova Føroya kann krevja, at freistin at avrokna meirvirðisgjaldið verður stytt, samanborið við ta vanligu freistina.

Fyri virki, ið eru í gongd, kann hetta verða kravt, tá ið virki tvær ferðir í einum ári ikki hevur avroknað meirvirðisgjald rættstundis, ella um so er, at virki hevur eina eftirstøðu av meirvirðisgjaldi, ið er 25.000 kr. ella meira.

Fyri nýggj virki, ið verða skrásett, aftaná at lógin er komin í gildi, kann stytt avrokningartíðarskeið verða kravt, tá ið tann, sum í verulekanum stendur aftanfyri virki, ið verður meldað til skrásetingar, hevur verið uppi í einum meirvirðisgjaldsskrásettum virki, ið hevur vanrøkt uppkrevjingina av meirvirðisgjaldi. Sum persónar ið verulekanum standa fyri virkinum, kunna eisini, umframt eigaran, eisini teir persónar, ið eru knýttir til eigaran við hjúnabandið, eru í slekt í upp- ella niðurgangandi linju, ella á annan hátt standa viðkomandi serliga nær, t.d. sambúgvandi. Sum persónar, ið standa aftanfyri virki, verða eisini nevndarlimir og limir av stjórnini at rokna.

Annað stig hevur við sær, at virkjum kann verða álagt at seta trygd fyri gjaldingini av meirvirðisgjaldi, tá ið virki, bóast tað hevur stytt avgjaldstíðarskeið, framvegis ikki avroknar rættstundis.

Nýggjum virkjum kann eisini verða álagt at seta trygd í staðin fyri at krevja, at avrokningartíðarskeiðið verður stytt, um so er, at kravið um at stytta freistina fyri avrokning ikki kann væntast at vera nóg mikið til at tryggja, at meirvirðisgjaldið verður avroknað rættstundis.

Tó er tað ein treyt, at tann, ið veruliga er aftanfyri virkið, frammanundan hevur verið uppi í einum øðrum virki, sum er farið konkurs ella verðið insolvent, har Toll- og Skattstova Føroya hevur eitt ótryggjað krav, ella landskassin hevur mist 50.000 kr. ella meira. Kravið um at seta trygd skal vanliga nýtast í teim førum har í Toll- og Skattstovan, eftir eini ítøkiligari metan, metir, at stórur váði er fyri nýggjum tapi, t.d. tá ið talan er um virki uttan persónliga skuldarábyrgd ella við vánaligum fíggjargrundarlagi. Endamálið er at seta forðing fyri, at somu persónar, tvs. "konkursryttarir" o.t., ferð aftaná ferð byrja virksemi, uttan at avrokna meirvirðisgjald til landskassan.

Triðja stig í fyriliggjandi uppskoti hevur við sær, at Toll- og Skattstova Føroya kann nokta skráseting av nýggjum virki, sum meirvirðisgjaldsskyldug, um tey ikki seta ta

kravdu trygd. Kravda trygdin er soleiðis ein treyt fyri at virki yvirhøvur kann skrásetast. Og um so er, at virki fer at reka skrásetingarskyldugt virksemi, kann tað revsast við bót, hefti ella fongsli upp til 2 ár.

Orsøkin til at skrásetingin sambært uppskotinum ikki verður tikin frá skrásettum virkjum er, at hesi hava rikið vinnu í longri tíð, og tí hava starvsfólk, ið hava langar uppsagnarfreistir og hava skyldur sambært sáttmálum.

Um so er, at skrásetingin bleiv tikin í hesum førum, hevði tað havt við sær, at tað hevði verið ógvuliga fløkt eftir hvørjum reglum inngjaldingin skuldi verið gjørd í tíðini, meðan virkið bleiv endað, somuleiðis sum tað hevði verið ógreitt, í hvønn mun tað hevði verið revsivert, um so var, at virkið helt fram.

Avleiðingin fyri tey virki, ið ikki seta ta kravdu trygd, kann verða, at tey verða koyrd á húsagang, um møguleiki er fyri hesum, sambært reglunum í konkurslógini, soleiðis at leiðslan verður sett frá og tí ikki hevur atgongd at nýta skrásetingina av virkinum. Skrásetingarviðurskiftini fara ístaðin yvir til kurator í búnum, ið kann nýta tey, meðan virkið verður endað eftir teimum reglum, ið galda, meðan eitt virki í konkurs verður endað.

Um so er, at leiðslan, ið var á virkinum frammanundan, ynskir at halda fram, má hetta verða í einum nýggjum virki, ið krevur nýggja skrásetting, og í sovorðnum førum verður -sambært fyriliggjandi uppskoti - møguleiki at nokta skrásetting, um ein kravd trygd ikki verður sett.

Skotið er upp, at lógin skal verða galdandi frá 1. oktober 1995. Hetta fyri at geva virkjum ið eru í eftirstøðu, møguleika at rinda meirvirðisgjaldið ella fáa ein møgnliga gjaldsavtalu, -fyri ikki at koma í ta støðu, at Føroya Gjaldstova møguliga koyrir virkið á húsagang (letur inn konkursbegæring).

Umsitingarnar hjá Toll- og Skattstovuni og Føroya Gjaldstovu hava eisini tørv á at fáa ymiskar edv-skipanir o.a. uppá pláss, áðrenn lógin kemur í gildi.

ad 1) og 2): § 5, stk. 5 og § 20, stk. 3 viðvíkja skrásetting av virkjum og avgjaldstíðarskeiði, og her verður so skoytt uppí at javnbera við § 23 a, stk. 8, har krav um trygd í ávísum førum verða áløgd virkjum áðrenn tey kunna verða skrásett.
ad 3): § 23, stk. 2 verður strikað, tá ið § 23 a kemur í staðin fyri ásetingarnar í § 23, stk. 2.
ad 4): Nýggj § 23 a.
Stk. 1. ásetur objektiv kriterier fyri nær virki kunna setast á stytt avgjaldstíðarskeið.
Stk. 2. ásetur, í hvørjum tíðarskeiði stytta avgjaldstíðarskeiðið skal byrja, og nær uppgerð av avgjaldinum skal latast inn og gjaldast.
Stk. 3. her er heimild hjá Toll- og Skattstovuni at víkja frá reglunum um stytt avgjaldstíðarskeið fyri virkir, ið hava gjørt eina gjaldsavtalu, ið virkið heldur.

Stk. 4. heimild til at áleggja virkjum, ið verða fráboðað til skráseting, at nýta stytt avgjaldstíðarskeið. Her verður hugsað um virki, ið verða rikin av persóni/eigara, ið fyrr hevur verið í eftirstøðu.
Stk. 5. eftir hesum stk. hava virki møguleika, í staðin fyri at nýta stytt avgjaldstíðarskeið, at velja at seta trygd. Upphæddin verður møguligar eftirstøður + meðal avgjald fyri eitt 3 mánaða tíðarskeið. Trygdin skal verða sett fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið, og í hesum tíðarskeiði mugu nýggjar eftirstøður ikki koma.
Stk. 6. ásetur treytirnar fyri, nær eitt virki, ið er koyrt á stytt avgjaldstíðarskeið, aftur kann koma á vanligt avgjaldstíðarskeið.
Stk. 7. ásetur, at virki, ið eru skrásett, og ikki halda krøvini um stytt avgjaldstíðarskeið, skulu kunna áleggjast at seta trygd. Tá ið trygdin er sett, kann virkið fara aftur á vanligt avgjaldstíðarskeið.
Stk. 8. ásetur, at Toll- og Skattstovan eisini kann seta krav um trygd til eitt virki, ið verður fráboðað til skráseting, tá ið mett verður, at stytt avgjaldstíðarskeið ikki er nóg góð trygd fyri at verja landskassan móti nýggjum tapi. Virkið kann tí ikki skrásetast fyrr enn trygdin er sett.
Stk. 9. ásetur, hvussu Toll- og Skattstovan skal fráboða virkjum, at trygd skal setast, áðrenn virki kann skrásetast, og hvørjar avleiðingar tað fær fyri virkið, um trygdin ikki verður sett.

ad 5): Í § 33, stk 3 verður skoytt uppí, at tann, ið við vilja ella av grovum ósketni rekur skrásetingarskyldugt virksemi, tá ið virkinum er noktað skráseting eftir § 23 a, stk. 8, kann revsast við bót, hefti ella fongsli upp til 2 ár.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 26. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð 2. mai 1995 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen og Finnbogi Ísakson) er samdur við landsstýrið um, at miðað eigur at verða í móti at avmarka eftirstøðurnar hjá landskassanum mest møguligt, og er uppskotið ætlað at fyribyrgja hesum.

Meirilutin heldur, at heimildirnar hjá Toll- og Skattstovuni verða so víttfevnandi, at ikki er neyðugt at ásetta, at tann, ið hevur tilknýti til eigaran á sama hátt sum ásetingarnar í § 115, stk. 1, 2. pkt. í partafelagslógini, ella er limur í nevndini hjá virkinum ella stjórnini eisini skal koma undir reglurnar í lógaruppskotinum, og setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

til
uppskot landsstýrisins

1) Í uppskoti landsstýrisins um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald verður § 1, 4. stk., orðað soleiðis:
"Toll- og Skattstova Føroya kann áleggja virkjum, ið verða fráboðað til skrásetingar, at nýta stytt avgjaldstíðarskeið v.m. eftir reglunum í stk. 1. Krav um stytt avgjaldstíðarskeið v.m. kann verða álagt, tá ein eigari av virkinum innanfyri seinastu 5 árini hevur verið eigari av ella limur í nevndini ella stjórnini hjá einum øðrum virki, ið innanfyri hetta tíðarskeið ikki hevur goldið meirvirðisgjald rættstundis ella hevur verið í eftirstøðu. Er tann skásetti eitt vinnufelag v.m., verður eisini ein persónur, ið eigur slíkar fíggjarpartar í avgjaldsskylduga virkinum, sum verða roknaðir sum partabrøv hjá høvuðspartaeigara sbrt. § 4 a, stk. 2-4 í virðisbrævaskattalógini, ella eitt vinnufelag v.m., sum eigur slíkar fíggjarpartar í avgjaldsskylduga virkinum. Stytt avgjaldsskeið v.m. skal tó bert verða nýtt, tá tað eftir ítøkiligari metan verður mett at vera tørvur á hesum fyri at tryggja, at goldið verður samstundis."

2) § 1, stk. 8, verður orðað soleiðis:
"Toll- og Skattstova Føroya kann í staðin fyri at seta krav um stytt avgjaldstíðarskeið v.m. eftir stk. 4 áleggja virkjum, ið verða fráboðað til skráseting, at seta trygd. Krav um trygd kann setast, tá ið eigari av virkinum, jbr. her eisini stk. 4, innanfyri tey seinastu 5 árini hevur verið eigari av ella limur í nevnd ella stjórn á øðrum skrásettum virki, ið er farið konkurs ella er vorðið insolvent, har

1) I landsstyrest forslag om ændring i lagtingslov om mersomsætningsafgift affattes § 1, stk. 4, således:
"Toll- og Skattstova Føroya kan pålægge virksomheder, der anmeldes til registrering, at anvende forkortet afgiftsperiode m.v. efter reglerne i stk. 1. Krav om forkortet afregningsperiode m.v. kan pålægges, når en ejer af virksomheden inden for de seneste 5 år har været ejer af eller medlem af bestyrelsen eller direktionen i en anden virksomhed, som inden for dette tidsrum ikke rettidigt har indbetalt afgift efter denne lov eller har været i restance. Er den afgiftspligtige et selskab m.v., anses som ejer også en person, der besidder sådanne kapitalandele, i den afgiftspligtige virksomhed, som henregnes til hovedaktionæraktier efter § 4 a, stk. 2-4 i virðisbrævaskattalógini, eller et selskab m.v., der besidder sådanne kapitalandele i den afgiftspligtige virksomhed. Forkortet afregningsperiode m.v. skal dog kun anvendes, når der efter et konkret skøn vurderes at være behov herfor for at sikre rettidig indbetaling.

2) § 1, stk. 8 affattes således:
"Toll- og Skattstova Føroya kan i stedet for at stille krav om forkortet afgiftsperiode m.v. efter stk. 4 pålægge virksomheder, der anmeldes til registrering, at stille sikkerhed. Krav om sikkerhed stilles, når en ejer af virksomheden, jf. herved også stk. 4, inden for de seneste 5 år har været ejer af eller medlem af bestyrelsen eller direktionen i en anden afgiftspligtig virksomhed, der er gået

ið Toll- og Skattstova Føroya hevur krøv, ið ikki eru nóg væl tryggjað, ella landskassin hevur havt 50.000 kr. ella meira tilsamans í tapi av avgjaldi eftir hesi lógini. Trygdin skal tó bert setast, tá ið tað eftir eini ítøkiligari metan verður mett at vera stórur váði fyri, at kravið um stytt avgjaldstíðarskeið v.m. eftir stk. 4 ikki er nóg mikið til at tryggja, at avgjald eftir hesi lóg verður goldið rættstundis. Trygd skal setast fyri eini upphædd, ið eftir metan Toll- og Skattstovu Føroya samsvarar við tað væntaða miðalavgjaldið í einum 3 mánaða tíðarskeiði. Tá ið virkinum verður álagt at seta trygd, kann virkið ikki skrásetast, fyrr enn kravið um hetta er eftirlíkað. Eitt krav um setan av trygd, skal fráboðast virkinum, seinast 14 dagar aftaná at virkið hevur latið inn skrásetingarskjal."

konkurs eller er blevet insolvent, hvorved Toll- og Skattstova Føroya har et ikke fuldt sikret tilgodehavende, eller landskassen er blevet påført et samlet tab på mere end 50.000 kr. vedrørende afgift efter denne lov. Sikkerhed skal dog kun stilles, når der efter et konkret skøn vurderes at være en nærliggende risiko for, at et krav om forkortet afregningsperiode m.v. efter stk. 4, ikke er tilstrækkeligt til at sikre, at tilsvar af afgift efter denne lov indbetales rettidigt. Sikkerhed skal stilles for et beløb, der efter Toll- og Skattstovu Føroya skøn svar til det forventede gennemsnitlige tilsvar af afgift efter denne lov, i en 3-måneders periode. Når virksomheden pålægges at stille sikkerhed, kan virksomheden ikke registreres, før dette pålæg er opfyldt. Et pålæg om sikkerhedsstillelse skal meddeles virksomheden senest 14 dage efter, at virksomheden anmeldes til registrering."

Minnilutin (Jørgen Niclasen) heldur, at neyðugt er at steðga verandi óhepnu gongd í MVG-eftirstøðuni, men í fyriliggjandi uppskoti er stórur vandi fyri at raka ósekar persónar.

Minnilutin vísir á, at í galdandi lóg eru fleiri heimildir hjá gjaldstovuni at steðga eftirstøðu, sum ikki verða nýttar.

Ein skerpan av innkrevjingini eftir galdandi lóg eigur at verða gjørd, áðrenn fleiri reglur verða gjørdar.

Minnilutin tekur við hesum viðmerkingum ikki undir við uppskotinum hjá landsstýrinum.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskot landsstýrisins sum broytt av skattanevndini samtykt við 19-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

Lóg nr. 108 frá 29. juni 1995.

FL jnr. 2530-1/91.

175 Uppsøgn av avtalunum við danir og skattalætta til øll

Ár 1995, hósdagin 27. apríl legði Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, vegna tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya Løgting samtykkir at boða ríkisstjórnini frá, at tað ynskir avtalurnar við stjórnina settar úr gildi. Samstundis mugu nýggjar samráðingar takast upp um nýggjar avtalur, viðvíkjandi uttanlandsskuld føroyinga.

Viðmerkingar:

Støðan í Føroyum er so vónleys, at ein stórur partur av føroyska fólkinum er noyddur at rýma av landinum undan tí høga skattatrýstinum. Hetta er serliga komið av teimum avtalum sum eru gjørdar við stjórnina síðani september 1992. Sigast kann um hesar avtalur, at hetta er reinu diktat frá danskari síðu. Hetta er serliga komið fram undir tí orðagongu, sum hevur verið í samband við dómarakanningina.

Her koma nýggjar upplýsingar fram hvønn einasta dag. Peningamál í Føroyum eru ríkismál, tí kann eingin ivi vera um, at tær kr. 2,7 milliardirnar sum lántar vórðu frá danum, at bjarga Sjóvinnubankahum og Føroya Banka, skuldi verið goldnar av danska ríkinum, har føroyingar bert eru 1/124 partur. Henda rokningin varð kalt og kyniskt hongd um hálsin á føroyska skattgjaldaranum, sum nú er við at hókna undir skattabyrðuni og tá er bert talan um rentuna av hesi skuld. Afturat hesum kemur onnur skuld hjá landskassanum, umleið tað sama, 3 milliardir krónur. Rentuútreiðslurnar á fíggjarlógini eru umleið 400 - 500 milliónir krónur. Tað er hesa rentuútreiðslu sum hetta uppskot miðar í móti at fáa burtur og skal tann sparda rentuútreiðslan brúkast til at lækka skattin hjá øllum skattaborgarum í landinum.

At støðan er vónleys, kunnu sjálvt danir hugsa sær. Tað eru eisini danskir fíggjarfrøðingar sum hava víst á tað sama, at um bankarnir skuldu bjargast av tí almenna, so áttu føroyingar bert at goldið 1/124 av hesum kr. 2,7 milliardum, sum hetta ævintýrið hevur kostað føroyska skattaborgaran hígartil. Tá eru renturnar ikki tiknar við. Veruleikin er eisini tann, at meginparturin av hesum peningi, er brúktur at keypa donsk virðisbrøv fyri. Tað kann tí verða ein spurningur um føroyskir skattaborgarar skulu blíva við at gjalda rentu av hesum peningi, nú hann er farin at yngla av sær, sambært roknskapinum fyri 1994 frá samanlagda bankanum.

Fíggingargrunnurin frá oktober 1992 er ein "*hastardur*", sum hevur sveimað uttanfyri bæði føroyskt og danskt lógarøki. Peningurin sum er settur í fíggingargrunnin er hongdur um hálsin á føroyska skattaborgaranum. Tí skuldi hesin grunnur verið skrásettur í Føroyum sambært galdandi lóg, tí endamálið við grunninum var at virka í Føroyum og at skjóta nýggjan kapital inn í neyðkomnar føroyskar peningastovnar. Sambært somu lóg skuldi meirilutin í nevndin verið búsitandi í Føroyum.

Tað sum Føroya løgting og landsstýrið eru tvingað at gera, um ikki alt fólkið skal rýma av landinum, er at fáa eina avtalu við donsku stjórnina um at útseta hesa skuld, og at strika 123/124 partar av kr. 2,7 milliardum, sum er danski parturin av at bjarga bankunum. Tá kunnu vit fara í holt við at lækka skattatrýstið í Føroyum samsvarandi, so tað aftur fer at loysa seg at arbeiða í Føroyum. Skuldina, sum eftir verður, kunnu vit gjalda dønum, tá oljan er farin at renna úr føroysku undirgrundini.

1. viðgerð 2. mai 1995. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 27. april 1994 og eftir 1. viðgerð 2. mai 1995 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt uppskotið og býtt seg í ein meiriluta og 3 minnilutar.

Meirilutin (Helena Dam á Neystabø, Jógvan A. Johannessen, Kristian Magnussen og Jákup Lamhauge) er samdur við viðmerkingum upppskotsstillarans, at búskaparliga støðan í Føroyum er sera trupul. Men ein fortreyt fyri at seta avtalurnar við donsku stjórnina úr gildi er, at full greiða er fingin á øllum avleiðingunum, eins og hetta er ein spurningur, sum Føroya fólk av røttum átti at havt høvi at tikið støðu til. Føroya landsstýri og Føroya løgting er bundið av teimum avtalum, sum undanfarin landsstýri hava gjørt við donsku stjórnina, og kann meirilutin tí ikki taka undir við uppskotinum.

Minnilutin (Jógvan Durhuus og Bjarni Djurholm) tekur undir við málinum.

Minnilutin (Jenis av Rana) tekur ikki undir við uppskotinum og teimum viðmerkingum, sum eru knýttar at hesum. At geva øðrum tjóðum og fólkum skuldina fyri ta "vónleysu støðu, Føroyar eru komnar í" er lítið mansligt fyri teir politikarar okkara, sum gingu undan, bæði í skilaleysari stýran av landi okkara og í sokallaðum samráðingum við m.a. danir - samráðingum, sum rættast er at kalla treytaleyst knæfall fyri móttpartinum.

Meira virðiligt hevði verið at trivið í egnan barm, játtað egnan mátt- og dugnaloysi í farnum døgum, og síðani saman sett út nýggja kós - væl brynjað við royndunum, farna tíðin átti at havi givið hvørjum okkara.

Eru beinleiðis skeivleikar framdir móti okkum sum tjóð, ber annars til at fáa slík mál viðgjørd í hartil ætlaðum forum.

2. viðgerð 1. juni 1995. Málið fall við 11-0 atkvøðum.

176 Breyð undantikið MVG (meirvirðisgjaldi)

Ár 1995, týsdagin 2. mai legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:
Í § 2, stk. 3 verður sett nýtt soljóðandi litra "p": "breyð".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om meromsætningsafgift med senere ændringer foretages denne ændring:
I § 2, stk. 3 indsættes sålydende nyt litra "p": "brød".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Meirvirðisgjaldið tyngir øgiligt í føroysku húsarhaldunum, og so er tað so stórt sum í ongum øðrum landi, heili 25%.

Neyðsynjarvørur áttu at verið undantiknar meirvirðisgjaldi.

Við hesum uppskoti verður roynt at taka eina av neyðsynjarvørunum undan, sum kemur øllum til gagns hørnum eins væl og vaksnum.

Í pengum týðir tað ikki nógv fyri landskassan, at einstøk vøra verður undantikin meirvirðisgjaldi, men fyri húsarhaldini í landingum og tey, sum hava nógvar munnar at metta, hevur tað stóran týdning, at tey skulu gjalda minni fyri breyðið í munnin.

Eisini fyri føroyskt bakivirksemi og handil hevur tað stóran týdning, at vørur teirra gerast bíligari hjá fólki at keypa.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum- Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 2. mai 1995 og eftir 1. viðgerð 4. mai 1995 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið. **Ein samd nevnd** tekur ikki undir við málinum.

2. viðgerð 29. mai 1995. Málið fall við 4-0 atkvøðum.

177 Avtøka av MVG (meirvirðisgjaldi) á sjómansheimum og hotellum/matstovum, sum hava ikki skeinkiloyvi

Ár 1995, týsdagin 2. mai legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Í § 2, stk. 3, litra "b" verður eftir "umlættingarheim" sett: "sjómansheim, hotel/matstovur, sum hava ikki skeinkiloyvi."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om meromsætningsafgift med senere ændringer foretages denne ændring:

I § 2, stk. 3, litra "b" indsættes efter "plejehjem": "sømandshjem, hoteller/restauranter, der ikke har udskænkningstilladelse."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Sjómansheimini gera eitt dygdargott sosialt arbeiði, sum samfelag okkara illa fær verið fyriuttan. Síðan Tórshavnar Sjómansheim í 1923 læt upp, eru tey vorðin inngrógvin í føroysku fólkasálina.

Til fyri stuttum var á fíggjarløgtingslógini játtaður nýggjum sjómansheimum peningur við teirri grundgeving, at hesi gera eitt neyðugt sosialt arbeiði millum sjófólk okkara. Aðrir stovnar av sama slagi, sum veita tað, ið meirvirðisgjaldslógin kallar "umsorgan og stuðul", sleppa undan meirvirðisgjaldi.

Tað eigur eisini at vera havt í huga, at sjómansheimini reka rúsdrekkafrítt hotel- og matstovuvirksemi.

Undir viðgerðini av rúsdrekkalógini søgdu hotelstjórar við rættarnevnd løgtingsins og almenningin, at skeinkiloyvi vildi bøta avgerandi um rakstur teirra.

Hendan "vinningsbata" fáa sjómansheim ikki og heldur ikki tey hotel og tær matstovur, sum ikki hava og heldur ikki vilja hava skeinkiloyvi.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 2. mai 1995 og eftir 1. viðgerð 4. mai 1995 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið. **Ein samd nevnd** tekur ikki undir við málinum.

2. viðgerð 29. mai 1995. Málið fall við 4-0 atkvøðum.

178 Kanning av bankamálinum

Ár 1995, hósdagin 27. apríl legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur støðu til, um viðlagda uppskot frá løgmálaráðnum til lóg um kanning av føroyska bankamálinum skal fremjast.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 24/1994 samtykti løgtingið tann 19. januar 1995 við 31-0 atkvøðum uppskot frá rættarnevndini um at seta ein kanningarrætt at kanna samanleggingina av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka og at § 21 a í rættargangslógini verð lýst at galda í Føroyum.

Í skrivi dagfest 26. januar 1995 heitti landsstýrið á stjórnina um at seta niður nevnda kanningarrætt og at leggja fram uppskot til fólkatingslóg um broyting av føroysku rættargangslógini, soleiðis at § 21 a í donsku rættargangslógini eisini varð sett í føroysku rættargangslógina.

Í skrivi dagfest 27. januar 1995 boðar forsætismálaráðharrin frá, at stjórnin heldur vil hava eina serkøna nevnd at kanna bankamálið og skjýtur upp, at hann og landsstýrið møtast at tosa um setningin hjá serkønu kanningarnevndini.

Uppskotið frá stjórnini um í staðin at seta eina serkøna kanningarnevnd leggur landsstýrið fyri formansskapin hjá løgtinginum og í skrivi dagfest 30. januar 1995 boðar formansskapurin frá, at stjórnin eigur at ganga einmæltu samtyktini frá løgtinginum um eina dómarakanning á møti.

Landsstýrið boðaði sama dag stjórnini frá, at tað tók undir við mótmælinum frá løgtinginum um, at samtyktin um eina dómarakanning ikki verður gingin á møti.

Tann 10. februar 1995 sendir forsætismálaráðharrin aftur landsstýrinum eina frágreiðing um teirra støðu í málinum saman við einum uppskoti til kommissorium fyri kanningarnevndina.

Hetta uppskot verður eisini lagt fyri formansskapin hjá løgtinginum, sum tekur somu støðu sum frammanundan.

Á fundi við landsstýrið tann 20. apríl 1995 handaði løgmálaráðharrin Bjørn Westh landsstýrinum viðlagda uppskot til lóg um kanning av føroyska bankamálinum.

Eftir hesum uppskoti skal bankamálið framvegis kannast av eini serkønari nevnd, men fær henda nevnd eisini møguleika fyri at nýta ein vanligan dómstól til munnligar avhoyringar.

Landsstýrið hevur latið uppskotið frá løgmálaráðnum kanna av løgfrøðingum og fylgir hjálagt ein frágreiðing frá hesi kanning.

Landsstýrið hevur samtykt at leggja lógaruppskotið fyri løgtingið til støðutakan.

1. viðgerð 3. mai 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Í løgtingsmáli nr. 24/1994: Kanning av samanleggingini av Sjóvinnuábankanum og Føroya Banka - samtykti løgtingið tann 19. januar 1995 við 31-0 atkvøðum soljóðandi uppskot til samtyktar:

"U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at heita á ríkisstjórnina um samb. grein 21 a í rættargangslógini at seta ein kanningarrætt við hesum kommisorium:

Kanningarrætturin skal kanna og greiða gongdina viðv. partabrævaumbýtinum í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum 22. mars 1993.

Vísandi til pkt. 1 - 6 í hesum áliti skal rætturin kanna:

1) **Leiklutin og ábyrgdina hjá Fíggjareftirlitinum í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

2) **Leiklutin og ábyrgdina hjá Fíggingargrunninum í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

3) **Leiklutin og ábyrgdina hjá Forsætismálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum og Ídnaðarmálaráðnum í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

4) **Leiklutin og ábyrgdina hjá grannskoðanum í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

5) **Leiklutin og ábyrgdina hjá Den Danske Bank í Føroya Banka í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

6) **Leiklutin og ábyrgdina hjá nevnd og stjórn í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum í samband við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

7) **Leiklutin og møguliga medábyrgd hjá Føroya Landsstýri í samhand við bankabjargingarnar og partabrævaumbýtið 22. mars. 1993.**

Niðurstøðan av kanningini verður latin ríkisstjórnini, landsstýrinum, fólkatinginum, og løgtinginum."

Í samband við, at uppskotið varð samtykt, samtykti Løgtingið eisini at heita á ríkisstjórnina um at seta § 21a í rættargangslógini í gildi í Føroyum.

Aftaná samtyktina varð málið sent landsstýrinum til víðari avgreiðslu 20. januar 1995. Á fundi tann 26.januar 1995 samtykti landsstýrið at senda ríkisstjórnini uppskotið.

Tann 27. januar 1995 svaraði ríkisstjórnin, at áheitanin varð víst aftur, og ríkisstjórnin bjóðaði í staðin eina serfrøðingakanning uttan serliga heimild.

Uppskotið hjá ríkisstjórnini um serfrøðingakanning varð viðgjørt av formansskapinum í løgtinginum. Formansskapurin vísti uppskotinum aftur, samstundis sum hildið var fast um kravið um eina dómarakanning.

Tann 1. apríl 1995 kom Bjørn West, løgmálaráðharri, til Føroya fyri at kunna seg um støðu føroyinga í málinum. Í hesum sambandi varð fundur hildin við umboð fyri allar flokkar á tingi og landsstýri.

Tann 20. apríl 1995 kom Bjørn West aftur til Føroya og legði fram verandi uppskot til kanning av tí føroyska bankamálinum. Í hesum sambandi varð fundur hildin við umboð fyri allar flokkar á tingi og landsstýrið.

Tann 27. apríl 1995 legði landsstýrið uppskotið frá ríkisstjórnini fyri løgtingið til støðutøku. Aftan á 1. viðgerð tann 3. mai 1995 varð málið beint í rættarnevndina.

Samtyktin hjá Føroya løgtingi um eina dómarakanning stendur við óbroytt. Hóast hetta hevur rættarnevndin viðgjørt uppskotið frá ríkisstjórnini.

Undir viðgerðini hevur rættarnevndin havt fund við embætismenn í løgmálaráðnum. Fundarfrágreiðingin frá hesum fundi verður løgd við sum skjal 1.

Undir viðgerðini hevur rættarnevndin eisini ráðført seg við føroyskan, løgfrøðiligan sakkunnleika umframt danskar serfrøðingar á økinum. Fundir hava verið við føroysku løgfrøðingarnar: Poul Hansen, Jónfinn Thomsen og Hans Trygva Henriksen, sum hava skrivað responsum í málinum.

Poul Hansen og Jónfinn Thomsen hava skrivað responsum eftir áheitan frá Føroya landsstýri, meðan Hans Trygvi Henriksen hevur skrivað responsum eftir persónligari áheitan frá Bjarna Djurholm, limi í rættarnevndini.

Responsumið frá Poul Hansen og Jónfinn Thomsen er lagt við sum skjal 2 og responsumið frá Hans Trygva Henriksen er lagt við sum skjal 3.

Rættarnevndin hevur harumframt sett seg í samband við danskar serfrøðingar á økinum. Serfrøðingarnir, ið talan er um, eru Lars Nordskov Nielsen, professari og fyrrverandi Umboðsmaður Fólkatingsins, Jens Peter Christensen, lektari, Eva Smith og Henrik Zahle, professarar á Keypmannahavnar Universiteti.

Fundarfrágreiðingarnar við nevndu persónar verða lagdar við sum ávikavist skjal 4, 5 og 6.

Út frá teimum upplýsingum, rættarnevndin hevur fingið, er tað greitt, at tað er ein politisk avgerð, at ein dómarakanning ikki skal setast í verk, hóast § 21A í rættargangs-

lógini framvegis er í gildi. Henda lógargrein heimilar løgmálaráðharranum at seta ein kanningarrætt (at gera eina dómarakanning) av ávísum málum.

Eftir at ríkisstjórnin, styðjað av teimum konservativu í Fólkatinginum, hevur tikið ta støðu, at ongin dómarakanning skal gerast, hevur løgmálaráðið gjørt uppskot til lóg um eina serfrøðingakanning av føroyska bankamálinum.

Undir nevndarviðgerðini hevur rættarnevndin sett sær fyri at lýsa munirnar millum uppskot stjórnarinnar og heimildirnar í eini dómarakanning. Við støði í hesi greining hevur rættarnevndin hesar viðmerkingar til uppskotið frá løgmálaráðnum, sum Landsstýrið hevur lagt fyri tingið uttan tilmæli um støðutakan:

Sambært uppskotinum frá ríkisstjórnini, skal løgmálaráðið seta eina kanningarnevnd av serfrøðingum. Rættarnevndin heldur, at um ein slík kanningarnevnd skuldi verið sett, áttu landsstýri og løgting at havt avgerandi ávirkan á, hvør kom í nevndina. Málið um eina kanning av bankamálinum er reist og samtykt í Løgtinginum. Tað hevði tí verið rímiligt, at Landsstýrið sum umsitingarvald í samráð við rættarnevndina umboðandi Løgtingið góðkendi samansetingina av nevndini.

Undir viðgerðini er komið fram, at tað ber í sær vansar, um ein slík kanningarnevnd sjálv skuldi staðið fyri avhoyringunum. Nevndin hevði ikki í nóg stóran mun verið før fyri at viðgjørt allar tær upplýsingar, sum høvdu komið fram undir kanningini á rættan hátt. Rættarnevndin heldur tí, at tað hevði verið skilagott at latið ein serkønan staðið fyri avhoyringunum, um ein serfrøðingakanning varð gjørd. Hetta kundi verið ein persónur við hollum royndum at avhoyra fólk, t.d. ein persónur frá statsadvokatinum ella ein royndur advokatur.

Í uppskotinum frá løgmálaráðnum verður ásett, at kanningin skuldi snúð seg um tær avgerðir, sum tiknar eru frá 1992 og fram til, at bankarnir vórðu samanlagdir í 1994. Tað er nú komið fram, at fleiri viðurskifti, ið kunnu hava týdning fyri málið, eru frá einum tíðarskeiði, sum røkkur longur aftur enn til 1992 umframt, at ørkymlandi viðgerðin av málinum, síðan málið kom á tingborð í december 1994, ger, at neyðugt er at víðka kanningina at umfata eitt longri tíðarskeið.

Løgtingið samtykti 19. januar 1995 eitt kommissorium til eina dómarakanning. Rættarnevndin heldur, at um ein serfrøðingakanning varð gjørd, átti nevndin at hildið sig til tað kommissoriið, sum Løgtingið samtykti. Í hesum kommissorii er ongin tíðaravmarking. Eisini er nevnt í kommissoriinum, hvørjir myndugleikar, stovnar, felløg o.a. skula avhoyrast.

Á fundum við serfrøðingar á økinum er rættarnevndin gjørd varug við, at um ein serfrøðingakanning skuldi verið gjørd, er tað ikki greitt, hvussu møguligar avleiðingar av frágreiðingini frá nevndini skuldu verið viðgjørdar. Hevði ósemja tikið seg upp um, antin niðurstøðan kundi verið grundarlag fyri rættarligari ábyrgd ella ikki, so eru ongar ásetingar í uppskotinum hjá ríkisstjórnini um, hvussu ein slíkur spurningur skuldi verið avgreiddur. Hetta er ein mangul í lógaruppskotinum hjá ríkisstjórnini.

Sambært uppskotinum hjá ríkisstjórnini skuldi kanningin í høvuðsheitum verið skrivlig. Hetta kundi havt við sær, at kanningin hevði verið sera drúgv. Undir málsviðgerðini er staðfest, at eingin løgfrøðilig grundgeving er fyri skrivligari kanning. Rættarnevndin er av teirri áskoðan, at munnligar avhoyringar hava eyðsýndar fyrimunir. T.v.s., at kanningin hevði verið effektivari, meira djúptøkin og hevði havt eina vitni-psykologiska effekt, sum ikki fæst undir skrivligum avhoyringum. Okkurt bendir somuleiðis á, at einki skrivligt tilfar finst um hendingar, sum kunnu hava týdning fyri málið, og hevði tað tí verið umráðandi, at hesar upplýsingar vórðu fingnar til vega við munnligum avhoyringum.

Reglurnar í rættargangslógini um rættarligar avhoyringar eru, at avhoyringarnar skuln vera munnligar. Tí heldur rættarnevndin, at sjálvt um ein serfrøðingakanning hevði verið gjørd í staðin fyri eina dómarakanning, áttu avhoyringarnar at verið munnligar.

Eftir uppskotinum hjá ríkisstjórnini høvdu partarnir havt skyldu at givið frágreiðing fyri kanningarnevndini undir vitnisábyrgd og høvdu fingið álagt tær í rættargangslógini tilskilaðu avleiðingar, um teir t.d. sýttu fyri at lata kravdar upplýsingar.
Hetta er tó ikki galdandi, um sýtt hevði verið fyri at útflýggja skjøl og tilfar.

Tað er óheppið, at tað ikki hevði fingið somu avleiðingar, um sýtt varð fyri at útflýggja skjøl, sum at sýta fyri at geva munnligar upplýsingar í málinum. Kapittul 28 í rættargangslógini um "parternes og tredjemands forpligtelse til at fremlægge synbare bevismidler" átti tí at verið galdandi viðvíkjandi skylduni til at útflýggja skjøl, um ein serfrøðingakanning varð gjørd.

Uppskotið hjá ríkisstjórnini ásetur, at kanningin skuldi farið fram aftan stongdar dyr. Til hetta hevur rættarnevndin ta viðmerking, at ein týðandi táttur í hesum máli er at skapa álit, bæði millum føroyskar og danskar myndugleikar og millum myndugleikar og almenning. Ein serfrøðingakanning átti tí at verið almenn. Hetta samsvarar samstundis reglunum í rættargangslógini og grundlógini um rættarligar avhoyringar. Ein serfrøðingakanning átti sjálvsagt eisini at virt reglurnar í rættargangslógini um, at avhoyringarnar í ávísum førum kunna vera fyri afturlatnum hurðum.

Út frá tí,ið er ført fram omanfyri, kann **ein samd rættarnevnd** tí ikki mæla til at samtykkja uppskotið hjá ríkisstjórnini og setir tí fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar.

Løgtingið tekur ikki undir við "Forslag til lov om undersøgelse af den færøske banksag", sum Føroya Landsstýri hevur lagt fram í løgtingsmáli nr. 178/1994.

2. viðgerð 30. mai 1995. Uppskot nevndarinnar til samtyktar fall við 15-0 atkvøðum. Rættarnevndarformaðurin Bjørn á Heygum bað um at fáa málið aftur í rættarnevndina og varð hetta samtykt við 18-0 atkvøðum. Eisini varð við 31-0 atkvøðum samtykt at víðka rættarnevndina við einum limi úr hvørjum flokki til viðgerð av hesum málinum.

30. mai 1995 legði víðkaða rættarnevndin fram soljóðandi

Ískoytisálit

Rættarnevndin hevur áður lagt fram álit í løgtingsmáli nr. 178/94, og standa viðmerkingarnar hjá rættarnevndina við óbroyttar.

Samstundis verður lagdur dentur á, at Føroya Løgting hevur biðið um eina dómarakanning við einum nærri tilskilaðum arbeiðsetningi, sum hevur til endamáls at lýsa bankamálið út í æsir. Henda áheitan við umrøddu endamáísorðing verður fasthildin.

Grundað á broyttar fyritreytir og eina tilsøgn frá donsku stjórnini um at fremja ávísar munandi broytingar í upprunaliga lógaruppskotinum, mælti formaðurin í rættarnevndini til at beina málið aftur í nevnd. Í hesum sambandi samtykti tingið, at rættarnevndin varð víðkað við umboðum fyri teir flokkar, ið ikki hava sæti í rættarnevndini.

Rættarnevndin hevur býtt seg í fimm minnilutar.

Ein minnniluti (Bjørn á Heygum, Helena Dam á Neystabø, Marita Petersen og Karl Robert Johansen) setir fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur undir við "Forslag til lov om undersøgøelse af den færøske banksag", sum landsstýrið hevur lagt fram í løgtingsmáli nr. 178/1994, treytað av at hesar broytingar verða framdar í lógaruppskotinum:

1) **Kanningarnevndin verðnr sett av løgmálaráðnum í samráð við Føroya Landsstýri.**
2) **Løgmálaráðið tilnevnir sakkønan persón at taka sær av avhoyringunum í málinum.**
3) **Kanningartíðarskeiðið verður víðkað til eisini at fevna um øll viðurskifti av týdningi fyri bankamálið, sum liggja uttan fyri tað í lógini ásetta tíðarskeiðið.**

4) **Kanningarnevndin hevur rætt til at nýta reglurnar í Kap. 28 í rættargangslógini, tá biðið verður um skjalatilfar frá triðjamanni, sum hevur týdning fyri málið.**
5) **Kanningarnevndin avger sjálv í hvørjum einstøkum føri, um kanningin, harundir avhoyringar v.m. mest hóskandi skulu fara fram munuliga ella skrivliga.**
6) **Landsstýrið og ríkisstjórnin tilnevna hvør tríggjar eygleiðarar at fylgja við málinum. Eygleiðararnir skulu verða tvey umboð fyri ávikavist løgting og fólkating (andstøðu og samgongu), umframt ávikavist lands- og ríkisgrannskoðarin. Eygleiðararnir hava rætt til at vera hjástaddir á øllum rættarfundum og hava harumframt atgongd til alt tilfar og allar upplýsingar í málinum.**
7) **Formaðurin fyri kanningarnevndini gevur við føstum millumbilum pørtunum eina frágreiðing um gongdina í málinum. Landsstýrið og Ríkisstjórnin kunnu altíð krevja, at ein slík frágreiðing verður útvegað, um mett verður, at tørvur er á hesum.**

Viðv. týdninginum av teimum einstøku punktunum, hevur meirilutin í rættarnevndini hesar viðmerkingar:

1) Henda áseting ber í sær, at tilnevningin av kanningarnevndini bert kann fara fram, treytað av at full semja er millum partarnar.
2) Løgmálaráðið tilnevnir ein sakkønan, t.v.s. ein royndan advokat ella ein frá statsadvokatinum at taka sær av avhoyringunum í málinum.
3) Kanningartíðarskeiðið er nú óavmarkað og viðvíkir øllum tilfari av týdningi fyri málið.
4) Kap. 28 í rættargangslógini var ikki innihildin í upprunaliga lógaruppskotinum frá ríkisstjórnini, og hava embætismenn nú beinleiðis ásannað, at hetta var eitt mistak. Reglurnar verða nú tiknar við í broytta lógaruppskotinum.
5) Kravið um munnliga kanning er nú tikið til eftirtektar á taun hátt, at kanningarnevndin nú burturav avger, hvør kanningarháttur er best hóskandi og mest gagnligur fyri eitt haldgott kanningarúrslit. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður lagdur dentur á týdningin av eini munnligari kanning.
6) Eygleiðararnir skulu tryggja, at alt fer rætt og reiðiliga fram, umframt at hesir skulu hava høvi til at gera vart við skeivleikar og mistøk, soleiðis at mannagongdin og viðgerðarhátturin verður í tráð við tann málsetning, sum partarnir hava sett sær fyri hesi kanning.
7) Frágreiðingin frá nevndarformanninum skal lýsa gongdina í málinum, harundir hvussu tað líður við kanningini, hvørjir partar av kanningini eru nádir, og hvørji mál, nevndin hevur sett at fyri at avgreiða í einum komandi tíðarskeiði.

Minnilutin (Bjarni Djurholm) førir fram:

Aftan á at ein samd rættarnevnd mikudagin 24. mai 1995 legði fyri løgtingið álit í løgtingsmálinum nr. 178/94: Kanning av bankamálinum., hevur landsstýrissamgongan

havt loyniligar samráðingar um málið við ríkisstjórnina og hevur gjørt semju um broytingar í mun til álitið frá rættarnevndini.

Við støði í upplýsingunum, sum eru komnar fram undir viðgerðini av nýggja landsstýrisuppskotinum í bankamálinum, er ógjørligt at tryggja sær, at lógaruppskotið fer at geva kanningarnevndini tær heimildir, sum eitt einmælt løgting viðtók 19. januar 1995.

Síðan bankamálið varð reist, hevur rættarnevndin gjørt sær sera stóran ómak at fáa til vega upplýsingar, sum hava tryggjað, at løgtingið hevur havt dygdargott grundarlag at tikið støðu á.

Tað er tí møtimikið, at rættarnevndarformaðurin nú saman við einum meiriluta í rættarnevndini áleggur nevndini at hurla eitt broytingaruppskot ígjøgnum, tá tað er eyðsýnt, at fleiri álvarsligir ivaspurningar eru sera illa lýstir í broytingaruppskoti landsstýrisins.

Annað, sum vekir undran, er, at tað verður danska stjórnin, sum einsamøll skal skriva lógartekstin og viðmerkingarnar. Rættarnevndin hevur bert fingið áðurnevndu kladdu at taka støðu til. Tá tað harumframt nú eisini er vorðið greitt, at møguliga samtykta landsstýrisuppskotið ikki kemur aftur í løgtingið til endaliga støðutøku, er tað greitt, at løgtingið ongan møguleika hevur fyri at ávirka innihaldið í kanningarsetninginum, fer hann at víkja frá vilja løgtingsins.

Umframt at grundsjónarmiðini um munnligar og opnar avhoyringar eru slept, so manglar eisini kanningarsetningurin, sum eitt samt løgting samtykti 19. januar 1995. Somuleiðis eru møguleikarnir fyri ar staðfesta rættarligu ábyrgdina eisini sleptir.

Við hesum viðmerkingum kann minnilutin ikki taka undir við teimum broytingum, sum landsstýrissamgongan mælir til, men skjýtur í staðin upp at fasthalda álitið og uppskotið til samtyktar, sum ein samd rættarnevnd legði fyri løgtingið 24. mai 1995.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson) tekur ikki undir við broytingaruppskotinum, sum meirilutin í rættarnevvndini setir fram. Minnilutin vísir í staðin til ta einmæltu løgtingssamtyktina frá 19. januar 1995 um eina dómarakanning og til tað álit, sum rættarnevndin legði fyri tingið 24. mei 1995, har ein samd nevnd mælti tinginum frá at góðtaka uppskotið um eina serfrøðingakanning, sum løgmálaráðið hevur gjørt.

Undir viðgerðini í rættarnevndini fekst tá semja um at vísa á, at samtyktin um dómarakanning stendur við, og at nevndin ikki kundi góðtaka uppskotið frá løgmálaráðnum. Samstundis gjørdi nevndin tær viðmerkingar, at um ein serfrøðingakanning skuldi verið gjørd í staðin fyri eina dómarakanning, áttu sjey broytingar at verið gjørdar í uppskotinum frá løgmálaráðnum. Um stjórnin setti hesar broytingar í uppskotið og sendi tað í broyttum líki aftur til Løgtingið, var rættarnevndin siunað at viðgera tað nýggja uppskotið, men bant seg ikki til at góðtaka tað.

Hetta hevur ikki hent. Hóast rættarnevndin legði sítt álit fram mikudagin 24. mei, setti løgtingsformaðurin tað ikki á skránni fyrr enn til tingfundin í dag, týsdagin 30. mai. Løgtingið hevur sostatt ikki havt høvi til at taka støðu til uppskotið frá einari samdari rættarnevnd um ikki at góðtaka stjórnaruppskotið.

Heldur ikki hevur stjórnin latið nakað nýtt, broytt uppskot úr hondum. Tað einasta, sum hevur hent hesar sjey dagarnar, er, at telefoniskt samband hevur verið millum samgonguna og stjórnina. Í gjárkvøldið og út á náttina sat samgongan á fundi, meðan Bjørn á Heygum tosaði við løgmálaráðharran Bjørn Westh og embætismenn í løgmálaráðnum.

Út frá hesum telefonsamrøðum hevur formaðurin í rættarnevndini, Bjørn á Heygum, skrivað eitt uppskot til samtyktar í staðin fyri tað einmælta uppskotið frá rættarnevndini um at vraka uppskotið. Onki skjal frá løgmálaráðnum ella stjórnini er lagt fyri tingið ella rættarnevndina og enn minni nakað broytt lógaruppskot. Um Løgtingið samtykkir uppskotið, sum ein meiriluti í rættarnevndini hevur lagt fram í kvøld, sleppur tað fullkomuliga endanum í málinum um eina dómarakanning. Tær treytir, sum formaðurin í rættarnevndini sigur seg hava avtalað við løgmálaráðharran í telefonini

- tryggja okkum ikki eina munnliga kanning,
- tryggja okkum ikki eina almenna kanning,
- tryggja okkum ikki, at serfrøðinganevndin fer at arbeiða við tí kommissorium sum grundarlag, sum Løgtingið samtykti 19. januar 1995, og
- tryggja okkum ikki, at reglur verða í lógini um, hvussu møgulig óseinja um niðurstøður út frá kanningini skula greiðast.

Eitt dómari skal heldur ikki standa fyri kanningini, og kanningarnevndin ger ongar løgfrøðiligar niðurstøður.

Minnilutin heldur, at stjórnin og meirilutin í Fólkatinginum hava borið seg vanvirðiliga at mótvegis Føroya Løgtingi og Føroya fólki í hesum máli. Minnilutin heldur tí, at tað einasta rætta er, at Løgtingið heldur fast við sítt krav um eina dómarakanning av bankamálinum út frá tí kommissorium, sum eitt einmælt ting samtykti 19. januar í ár.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) førir fram:

Tá løgtingsmálið nr. 24/94: Kanning av samanleggingini av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka,- var til 1. viðgerð, boðaði miðflokkurin frá, at hann fór at atkvøða fyri tí kanningini, ið varð sett í verk.

Tá rættarnevndin kom aftur í tingið við álitinum og førdi fram, at kanningin bert skuldi umfata leiklutin og ábyrgdina hjá fíggjareftirlitinum, fíggjargrunninum, forsætismálaráðnum, fíggjarmálaráðnum, ídnaðarmálaráðnum, grannskoðanini í Føroya Banka, nevnd og stjórn í Føroya Banka og Sjóvinnubankanum, mátti miðflokkurin harðliga tala at, tí at nevndin ikki hevði tikið leiklutin og ábyrgdina hjá <u>føroyska politiska myndugleika-</u>

num, (landsstýrinum og ráðgevum tess) í samband við bankabjargingar og partabrævabýtið frá 22. mars 1994 við í kommissoriið.

Grundað á m.a. hesi sjónarmið miðfloksins, so hendi tó tað, at eitt ískoytisálit varð samtykt, har leikluturin og møgulig medábyrgd hjá landsstýrinum í samband við bankabjargingarnar og partabrævabýtið nú eisini var tengt at kanningini.

Sostatt var hetta uppskotið, løgtingsmál nr. 24/94: Kanning av samanleggingini av Sjóvinnubankanum og Føroya Banka - samtykt við 31-0 atkvøðum.

Landsstýrið sendi hesa løgtingssamtykt víðari til donsku stjórnina. har heitt varð á hana um at seta ein kanningarrætt.

Sum kunnugt vann málið ikki frama orsakað av, at fyrst og fremst Konservativi flokkurin saman við stjórnarflokkunum ikki tóku undir við, at fleiri dómarakanningar skuldu fremjast.

Tann 27. apríl 1995 leggur landsstýrið fyri tingið løgtingsmál nr. 178/94: Kanning av bankamálinum. - soljóðandi uppskot til samtyktar: Løgtingið tekur støðu til, um viðlagda uppskot frá Løgmálaráðnum til lóg um kanning av føroyska bankamálinum skal fremjast.

Uppskotið frá stjórnini er, at hon heldur vil hava eina serkøna nevnd at kanna bankamálið.

Eftir 1. viðgerð tann 3. mai 1995 varð málið beint í rættarnevndina. Málið kemur úr aftur rættarnevndini 24. mai 1995. Ein samd rættarnevnd mælir løgtinginum frá at samtykkja uppskotið frá donsku stjórnini.

Ein samd rættarnevnd vísir annars á í álitinum:
1. Rættarnevndin heldur, at um ein slík kanningarnevnd skuldi verið sett, átti landsstýrið og løgtingið at havt ávirkan á, hvør ið kom í nevndina.
2. Rættarnevndin heldur tí, at tað hevði verið skilagott at latið ein serkønan staðið fyri avhoyringunum, um ein serfrøðingakanning varð gjørd.
3. Tað er nú komið fram, at fleiri viðurskifti, ið kundu havt týdning fyri málið, eru frá einum tíðarskeiði, sum røkkur longur aftur enn til 1992, umframt at ørkymlandi viðgerðin av málinum, síðani málið kom á tingborð í december 94, ger, at neyðugt er at víðka kanningina at umfata eitt longri tíðarskeið.
4. Løgtingið samtykti 19. januar 1995 eitt kommissorium til eina dómarakanning. Rættarnevndin heldur, at um ein serfrøðingakanning varð gjørd, átti nevndin at hildið seg til tað kommissorium, sum løgtingið samtykti. Í hesum kommissorium er eingin tíðaravmarking. Eisini er nevnt í kommissoriinum, hvørjir myndugleikar, stovnar, felløg og annað skulu avhoyrast.
5. Á fundum við serfrøðingar á økinum varð rættarnevndin gjørd varug við, at um ein serfrøðingakanning skuldi verið gjørd, er tað ikki greitt, hvussu møguligar avleiðingar av frágreiðingini frá nevndini skulu verða viðgjørdar.

6. Undir málsviðgerðini er staðfest, at eingin løgfrøðilig grundgeving er fyri skrivligari kanning. Rættarnevndin er av teirri áskoðan, at munnligar avhoyringar hava eyðsýndar fyrimunir. T.v.s. at kanningin hevði verið effektivari, meira djúptøkin, og hevði havt eina vitnissykologiska effekt, sum ikki fæst undir skrivligum avhoyringum.
7. Nevndin vísir á, at kapittul 28 í rættargangslógini um "parternes og trediemandens forpligtelse til at fremlægge synbare bevismidler" átti at verið galdandi viðvíkjandi skylduni til at útflýggja skjøl, um ein serfrøðingakanning varð gjørd.
8. Loksins vísir nevndin á, "at ein týðandi táttur í hesum máli er at skapa álit, bæði millum føroyskar og danskar myndugleikar, og millum myndugleikar og almenningin. Ein serfrøðingakanning átti tí at verið almenn. Hetta samsvarar samstundis við reglunum í rættargangslógini og grundlógini um rættarligar avhoyringar. Ein serfrøðingakanning átti sjálvsagt eisini at virt reglurnar í rættargangslógini um, at avhoyringarnar í ávísum førum kunnu verða fyri afturlatnum hurðum.

Undir 2. viðgerð 30. mai 1995 varð málið beint aftur í rættarnevndina, sum varð víðkað við trimum limum.

Í broytingaruppskotinum til samtyktar tekur størsti minnilutin undir við uppskoti stjórnarinnar, treytað av at ávísar broytingar eisini verða framdar.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) ásannar, at partur av hesum treytum er fult í tráð við tey sjónarmið, sum ein samd rættarnevnd áður hevur ført fram, her kann t.d. verða víst á,

1. at kanningarnevndin verður sett av løgmálaráðnum í samráð við Føroya landsstýri,
2. at løgmálaráðið tilnevnir sakkønar persónar at taka sær av málinum.
3. at kanningartíðarskeiðið verður víðkað.
4. at kanningarnevndin hevur rætt til nýta reglurnar í § 28 í rættargangslógini.

Í so máta kann sigast, at fyrr álitið hjá einari samdari rættarnevnd, hevur ført við sær, at danska stjórnin hevur flutt seg munandi í mun til upprunauppskotið.

Í týðandi spurninginum, hvørt kanningin skal vera munnlig ella skrivlig, so verður tað kanningarnevndin sjálv, sum kemur at avgera hetta.

Hetta meta vit ikki at vera nóg góð trygd fyri, at intentiónirnar hjá rættarnevndini um eina munnliga kanning í fult mát verða fylgdar.

Sum áður nevnt, boðaði rættarnevndin í fyrra áliti sínum frá týðninginum av, at serfrøðingakanningin átti at verið almenn. Ikki kann sigast, at tað er tikið við í hetta broytingaruppskot. Tað í sær sjálvum er at harmast yvir, serliga tá hugsað verður um, at rættarnevndin hevur undirstrikað, at júst ein almenn kanning vildi styrkt álitið bæði millum føroyskar og danskar myndugleikar og millum myndugleikar og almenningin sum heild.

Kommissoriið, sum løgtingið samtykti 19. januar var í 7 punktum.

Ivi hevur tikið seg upp, hvørt kommissoriið í danska lógaruppskotinum lýkur treytirnar í løgtingssamtyktini. Her skal vísast til responsum frá Poul Hansen og Jónfinn Thomsen, advokatum, har teir beinleiðis siga soleiðis:
"Hetta kommissorium lýkur tó ikki treytirnar í løgtingssamtyktini, sum eisini áseta, at ábyrgdin hjá almennum myndugleikum í fíggjargrunnum og bankunum skal kannast."

Ikki er fingin trygd fyri í nevndararbeiðinum, at hetta kommissoriið, sum løgtingið samtykti á sinni er fevnt av hesi kanning, sum nú eftir øllum at døma, skal setast í verk.

Spurningurin um, hvussu møguligar avleiðingar av frágreiðingini hjá nevndini skulu verða viðgjørda eru heldur ikki tiknir við í uppskotinum frá størsta minnilutanum í rættarnevndini, og vísandi til tað, sum rættarnevndin áður hevur fört fram, er hetta nakað sum beinleiðis má sigast at vera ein mangul í uppskotinum hjá ríkisstjórnini.

Vísandi til omanfyri nevndu viðmerkingar, mælir minnilutin til framhaldandi samráðingar við danir við tí endamáli at fáa fløktu viðurskiftini landanna millum í rætt lag, soleiðis at politiska orkan her á landi kann verða brúkt til at loysa teir trupulleikar, sum í dag merkja dagligdagin hjá stórum parti av fólkinum, ið her búleikast.

Samsvarandi hesum setir minnilutin soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at halda fram við samráðingunum við donsku stjórnina við tí endamáli at fáa sett í verk eina dómarakanning ella eina kanning, sum svarar til hesa.

Minnilutin (Jákup Olsen) vísir á, at Føroya Løgting tann 19. januar 1995 samtykti at heita á ríkisstjórnina um sbrt. § 21 a í rættargangslógini at seta ein kanningarrætt við einum kommissorium í 7 punktum, og í álitinum frá rættarnevndini, dagfest 24. mai 1995, sigur nevndin, at Føroya Løgting stendur við eina dómarakanning óbroytt, og mælir løgtinginum til ikki at taka undir við uppskotinum hjá donsku stjórnini í bankamálinum.

Kristiligi Fólkaflokkurin er samdur við rættarnevndini í hennara niðurstøðu í uppskotinum til samtyktar frá 25. mai 1995, og er ikki sannførdur um niðurstøðuna hjá einari samdari rættarnevnd annars í spurninginum um at góðtaka uppskotið hjá donsku stjórnini.

Minnilutin (Jákup Olsen) kann tí heldur ikki taka undir við nýggju broytingaruppskotunum í 7 punktum hjá formanninum í rættarnevndini í løgtingsmáli nr. 178/1994 og metir ikki, at broytingarnar lúka somu treytir, sum rættargangslógin § 21 a ásetir.

Kristiligi Fólkaflokkurin metir, tað er spill av orku og tíð nú á triðja sinni at koma við øðrum uppskoti enn tað, sum rættargangslógin § 21 a heimilar, og somuleiðis metir minnilutin, at talan er um eitt einfalt krav frá føroyskari síðu. Einki annað kann koma upp á tal, og at tosa um onnur uppskot ella at minka krøvini til kanningina av bankamálinum er burturvið.

Minnilutin kann ikki ganga við til aðra kanning, og tí er tað truupult at skilja, at danska stjórnin brúkar tíð og orku at lóggeva av nýggjum, tá lógin kortini greitt heimilar ein kanningarhátt, sum Føroya Løgting hevur biðið um, bert fyri at sleppa undan at ganga tingsamtyktini á møti.

Kristiligi Fólkaflokkurin átalar harðliga arbeiðsháttin hjá dansku stjórnini og landsstýrinum og kann ikki góðtaka vinglutu støðuna hjá landsstýrissamgonguni í bankamálinum.

Kristiligi Fólkaflokkurin kann ikki góðtaka aðra kanning enn dómarakanning, og skuldi tað borið á, at annar kanningarháttur nú er upp á tal, so setir Kristiligi Fólkaflokkurin soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum, áðrenn støða verður tikin til annan kanningarhátt í bankamálinum, at senda málið út til fólkaatkvøðu, soleiðis at Føroya fólk fær møguleika at siga sína hugsan til kanningarháttin, annaðhvørt tað skal vera ein dómarakanning, sum Føroya Løgting áður hevur samtykt ella ein serfrøðingakanning, sum danska stjórnin hevur mælt til, og sum nú eisini landsstýrissamgongan mælir til.

Um so er, at omanfyrinevnda uppskot ikki verður samtykt, so heldur Kristiligi Fólkaflokkurin støðuna vera so mikið álvarsama, at løgtingið eigur at taka spurningin upp, um at landsstýrið eigur at leggja frá sær, til viðgerðar, og setir soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Við tað, at landsstýrið í loyndum hevur samráðst við donsku stjórnina um uppskot, um serfrøðingakanning ímóti eini einmæltari løgtingssamtykt um dómarakanning av bankamálinum, meta uppskotsstillararnir, at hetta brot er so mikið álvarsamt, at hetta má fáa parlamentariskar avleiðingar fyri landsstýrið, heitt verður tí á løgtingið um at skipa so fyri, at landsstýrið leggur frá sær alt fyri eitt.

Framhaldandi 2. viðgerð 31. mai 1995. Uppskotið til samtyktar frá størsta minnilutanum endaliga samtykt við 17-15 atkvøðum. Atkvøtt varð við navnakalli. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum Tordi J. Niclasen fall við 15-0 atkvøðum. Uppskotini til samtyktar frá minnilutanum Jákupi Olsen fullu við ávikavist 14-0 og 12-1.

179 Løgtingslóg um stuðul til flutning av fiski

Ár 1995, hósdagin 27. apríl legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um stuðul til flutning av fiski.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at útgjalda stuðul til flutning av fiski frá uppboðssøla til virkingar á økjum, har firðir ella sund skilja og eingin uppboðssøla er.

§ 2. Landsstýrið ásetir í kunngerð flutningsstuðulin.

lagtingslov om støtte til transport af fisk.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at udbetale støtte til transport af fisk fra auktion til tilvirkning i områder, hvor fjorde eller sund skiller og ingen auktion er.

§ 2. Landsstyret fastsætter transportstøtten i bekendtgørelse.

§ 3. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Ætlanin við uppskotinum er, í rímiligan mun at javnstilla fiskaframleiðarar í økjum, har eingin uppboðssøla er, og neyðugt er at flyta fisk, keyptan á uppboðssølu, um firðir ella sund við strandfaraskipi, mótvegis fiskaframleiðarum í økjum har størri útboð er av fiski og betri og biligari flutningsmøguleikar.

Økini mest verður hugsað um eru Vágar, Sandoyggin og Nólsoy.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 26. mai 1995 legði fram soljóðadi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. apríl 1995 og undir 1. viðgerð 4. mai 1995 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Karl Róbert Johansen, Kjartan Joensen, Heini O. Heinesen og Jákup Olsen) vísir á, at í fleiri føtum er sera kostnaðarmikið at flyta fisk úr oyggjum, har eingin fiskauppkeypari er, og bygdum, ið liggja langt frá plássum, har fiskauppkeypari er, og skjýtur fiskivinnunevndin tí upp at heimila landsstýrinum at úgjalda flutningsstuðul til bátar á omanfyri nevndu plássum.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður sum nýtt stk. 2 innsett:
"**Stk. 2.** Landsstýrinum verður somuleiðis heimilað at útgjalda stuðul til flutning av fiski frá økjum, har eingin fiskakeypari er, til nærmasta avreiðingarstað. Hetta er bert galdandi fyri bátar, ið eru heimahoyrandi á omanfyri nevndu plássum.

I § 1 indsættes som nyt stk. 2:
"**Stk. 2.** Landsstyret bemyndiges til at udbetale støtte til transport af fisk fra områder hvor ingen fiskeopkøber findes, til nærmeste indhandlingssted. Dette er dog kun gældende for fartøjer der er hjemmehørende på ovennævnte steder.

Minnilntin (Álvur Zachariassen) tekur ikki undir við málinum.

2. viðgerð 29. mai 1995. Uppskotið sum broytt av fiskivinnunevndini samtykt við 24-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 67 frá 13. juni 1995.

180 Broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn

Ár 1995, hósdagin 27. apríl legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 69 frá 10. mai 1994 um ábyrgdargrunn verða gjørdar hesar broytingar:

1) Aftaná § 1 verður sum nýggj § 1 a sett:

"**§ 1 a.** 15 mió. kr. verða fluttar úr Ábyrgdargrunninum aftur í landskassan.

Stk. 2. Landsstýrinum verður heimilað at játta 12 mió. kr. til størri verkætlanir.

Stk. 3. Landsstýrinum verður heimilað at játta 3 mió. kr. til smærri menningarverkætlanir.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om garantifond.

§ 1.

I lagtingslov nr. 69 af 10. maj 1994 om garantifond foretages følgende ændringer:

1) Efter § 1 indsættes som ny § 1 a:

"**§ 1 a.** 15 mio. kr. flyttes fra garantifonden tilbage til landskassen.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at bevilge 12 mio. kr. til større projekter.

Stk. 3. Landsstyret bemyndiges til at bevilge 3 mio. kr. til mindre udviklingsprojekter.

Stk. 4. Landsstyret fastsætter nærmere betingelser for bevilgning af støtte før der udbetales støtte."

Stk. 4. Landsstýrið ásetir nærri treytir fyri veitan av stuðli áðrenn stuðul verður útgoldin."

2) § 4, stk. 4, 2. punktum verður strikað.

2) § 4, stk. 4, 2. punktum udgår.

§ 2.

Hetta lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Til 1) í lógaruppskotinum

Ætlan landsstýrisins er at nýta upp til 12 mió. kr. til 2 størri verkætlanir:

1) Irmingarhavsætlanin, ið snýr seg um at virka kongafisk úr Irmingarhavinum í Føroyum,
2) Sandoyarætlanin, har eitt virki hjá P/F Føroya Fiskavirking í Sandoynni skal latast upp aftur og virka frystan 3. lands fisk.

Harumframt er ætlanin at nýta upp til 3 mió. kr. til 4 minni menningarverkætlanir:

3) Gerð av almennum upplýsingartilfari um Føroyar,
4) Arbeiði í sambandi við Danida-verkætlanir.
5) Nýtsla av "konsulentum", sum skulu gera eitt uppsøkjandi arbeiði uttanlands fyri at útvega føroyskum fyritøkum bileggingar, og sum eisini kunnu leggja føroyskari vinnu lag á at finna nýggjar framleiðslur til útlutning.
6) Nýtsla av serfrøðingum, sum kunnu leggja okkum lag á, hvussu vit frægast kunnu fáa mest møguligt burtur úr okkara vinnulívi.

Eingin játtan er sett av á fíggjarlógini fyri 1995 til hesi endamál, men landsstýrið ynskir at fáa hesar verkætlanir í gongd skjótast til ber, og biður tí um heimild at flyta 15 mió. kr. úr Ábyrgdargrunninum aftur í landskassan.

Til størru verkætlanirnar verður rakstrarstað stovnað á § 16 á fíggjarlógini: "Størri verkætlanir" við 12 mió. kr. og til menningarverkætlanirnar verður rakstrarstað stovnað á § 18 á fíggjarlógini: "Smærri menningarverkætlanir" við 3 mió. kr.

Deildin fyri fiski- og aðrari vinnu ger tilmæli um tær einstøku verkætlanirnar, og treytirnar fyri veitan av stuðuli verða:

1) Irmingarhavsætlanin:

Stuðul verður latin til royndarverkætlanir viðvíkjandi virking av kongafiski (Sebastes mentella, oceanic type) á føroyskum virkjum landaður av føroyskum skipum. Virkið skal leggja fram útgreinda frágreiðing um verkætlanina, allar týðandi upplýsingar um

rávøru-, framleiðslu, marknaðar- og søluviðurskifti, útgreinda kostnaðar- og tíðarætlan og rakstrarætlan. Stuðulin kann útgjaldast tá skjalprógv fyri útreiðslum fyriliggja.

2) Sandoyarætlanin:
Stuðul verður latin til virking av frystum 3. lands fiski á einum virki hjá P/F Føroya Fiskavirking í Sandoynni. Umframt tann vanliga stuðulin til frystan fisk verður latin flutningsstuðul og byrjunarstuðul. Virkið skal leggja fram útgreinda frágreiðing um verkætlanina, allar týðandi upplýsingar um rávøru-, framleiðslu, marknaðar- og søluviðurskifti, útgreinda kostnaðar- og tíðarætlan og rakstrarætlan. Stuðulin kann útgjaldast tá skjalprógv fyri útreiðslum fyriliggja.

3) Upplýsingartilfar um Føroyar:
Landsstýrið ætlar at játta kr. 250.000,- til gerð av almennum upplýsingartilfari um Føroyar, føroysk vinnulig viðurskifti og føroyskar fyritøkur v.m. Síðani Færøernes Erhvervsforhold var givin út í 1988 og Faroese Business Environment í 1990 hevur einki tilfar verið um Føroyar, ið kann verða nýtt at geva útlendingum í sambandi við samviunu. Serliga meint hevur saknurin verið kendur hjá føroyskum fyritøkum, ið royna at føra seg fram uttanlands.

4) Arbeiði í sambandi við Danida-verkætlanir:
Landsstýrið ætlar at játta kr. 900.000,- til arbeiði í sambandi við Danida-verkætlanir. Hetta er sambært frágreiðing latin í samband við at ein bólkur frá danska uttanríkismálaráðnum vitjaði í Føroyum í februar í 1994 at upplýsa um tær skipanir, sum eru galdandi innan menningarhjálp, stuðul til eystanlond og eksportfremjandi skipanir. Landsstýrið fer at biðja danska uttanríkismálaráðið útvega "Task force" arbeiðsbólkinum ein serfrøðing í útflutningsspurningum, og landsstýrið útnevnir saman við vinnufeløgunum ein "ressourcepersón" at fylgja við í bilateralum og multilateralum útbjóðingum og sum kann ráðgeva føroyskum fyritøkum.

Til 2) í lógaruppskotinum:
Tað hevur vísst seg, at lógin um ábyrgdargrunn illa fæst at virka eftir ætlan. Tað eru avsettar 25 mió. í grunnin, men enn er einki játtað úr honum. Megin orsøkin fyri hesum er, at lógin er so avnarkað, at nevndin sum umsitir skipanina ikki metir, at tað er møguligt at umsita hana.

Løgtingið feldi fyrr í hesi tingsetuni uppskot um broytingar í lógini. Partur av hesum uppskoti verður nú sett fram av nýggjum. Orsøkin fyri hesum er, at landsstýrið framvegis metir, at henda skipan eigur at verða roynd. Og við uppskotnu broytingini verður mett, at skipanin kann koma at stuðla nýggjum virksemi. Broytingin er tann, at treytin í verandi lóg fyri at veita ábyrgd er, at talan bert kann vera um "nýggjar verkætlanir og framleiðslur, sum virkið ella einstaklingurin ikki áður hevur fingist við". Vit hava síðan fingið eina lóggávu, sum er serstakliga ætlað nýggjum vinnum. Tí kann tað vera rímiligt at broyta hesa lógina, so hon kann stuðla øking í verandi virksemi.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 23. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 27. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð tann 4. mai 1995 beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Óla Jacobsen, landsstýrismann.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirilutu og tveir minnilutar.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen og Álvur Zachariassen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein minnilutu (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar:

Tá lógin varð samtykt fyri 1 ári síðani, tók minnilutin ikki undir við hesi lóg.

Nú eitt ár seinri, ásannar landsstýrið, at henda lógin onki nýtt arbeiðsplass hevur skapt, og er nú uppskot um at flyta ein stóran part av peninginum, sum varð avsettur á seinastu fíggjarlóg aftur í landskassan. Hesin peningur skal nú nýtast sum stuðul til størri og smærri verkætlanir, eftir treytum, sum landsstýrið ásetir.

Til seinasta val, vóru tað flokkar, sum høvdu loysnir uppá alt, hvussu vit skuldu fáa støðga burturflytingini, vunnið á arbeiðsloysinum við at skaffa 1000 nýggj arbeiðsplass eftir fáum mánaðum. Vit kunnu staðfesta, at hetta vóru tóm orð.

Uppskotini, ið komin eru, hava ongar trupullcikar loyst, heldur tvørtur ímóti. Alt er lappaloysnir, og fyriliggjandi uppskot frá landsstýrinum talar fyri seg.

Við hesum uppskoti avtekur samgongan eina óbrúkiliga loysn fyri at skjóta eina aðra óbrúkiliga panikloysn upp.

Tá málið fekk viðgerð fyri einum góðum ári síðan, hevði minnilutin (Anfinn Kallsberg) hesar viðmerkingar til løgtingsmál nr. 173/1993:

Í staðin fyri at tora at gera tað, ið neyðugt er fyri at fáa búskapin aftur á føtur, nevniliga at fáa kappingarførið aftur í føroyskt vinnuliv, leypur man um garðin har hann er lægstur, og hyrjar aftur at játta almennan pening fyri at økja virksemið. Hetta er sum hjá kellingunum, sum pissa í sokkin. Vit kunnu nýta so nógvan almennan risikopening, sum vit vilja, men lønsemi í viununi verður ikki betri av tí.

Vit mugu tí í staðin fremja tað, ið fólkaflokkurin ferð eftir ferð hevur víst á, at vit mugu broyta fyritreytirnar hjá vinnuni soleiðis, at hon aftur loysir seg. Gera vit tað, so

er hvørki neyðugt við almennum partapeningi ella almennum lánum, tí tá eru fíggingarmøguleikar.

Støðan í dag er bert versnað síðani tá, og samgongan roynir at halta seg víðari, bert tí man ikki torir at ásanna, at eisini í hesum máli, hevur fólkaflokkurin rætt, og loysnir á trupulleikunum framefti.

Ein annar minniluti (Finnbogi Ísakson og Tordur J. Niclasen) tekur undir við punkt 1 í landsstýrisins uppskoti.

Minnilutin vísir á, at tingið fyrr í hesi tingsetu hevur felt broytingina í punkt 2, og mælir tí tinginum frá at samtykkja hesa broyting.

2. viðgerð 26. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Við atkvøðugreiðsluna 29. mai 1995 varð uppskotið samtykt við 26-0 atkvøðum, tó undantikið pkt. 2, sum skuldi hava kvalifiseraðan meiriluta og fall við 19-0 atkvøðum.

31. mai 1995 løgdu tingmenninir Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariasen og Hans Biskopstø fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð

Undirritaðu tingmenn: Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariassen og Hans Biskopstø, mæla tinginum til at samtykkja niðanfyri standandi uppískoyti til § 2, sum nýtt stk. 2.

§ 2, stk. 2:
"Stuðul eftir hesi lóg kann veitast til virking av kongafiski úr Irmingarhavinum, landaður til føroysk virki av føroyskum skipum aftaná 15. mai 1995."

§ 2, stk. 2:
"Støtte i henhold til denne lov kan bevilges til bearbejdning af rødfisk fra Irminger-havet, der indhandles til færøske virksomheder af færøske skibe efter den 15. maj 1995."

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum. Atkvøtt varð ikki um broytingaruppskotið til 3. viðgerð.

Lóg nr. 109 frá 29. juni 1995.

181 Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.

Ár 1995, hósdagin 27. apríl legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunnin fyri avreiðingar og lønir v.m.

§ 1

Í løgtingslóg nr 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m., við seinni broytingum, verður gjørd henda broyting:

Í § 7, stk. 1 verður sett sum pkt. 3:

"Arbeiðsgevarar rinda ikki gjald fyri løn hjá útlendingum undir FAS skipanini."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om garantifond for fiskeindhandlinger og løn m.m.

§ 1

I lagtingslov nr. 68 af 9. juni 1988 om garantifond for fiskeindhandlinger og løn m.m., med senere ændringer, ændres følgende:

I § 7, stk. 1 indsættes følgende som pkt. 3:

"Arbejdsgivere betaler ikke ind til fonden af løn hos udlændinge under FAS ordningen."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

FAS-skipanin hevur ikki virka eftir ætlan, m.a. av tí at skipaánarar hava verði skyldugir at rinda gjald til Trygdargrunnin, fyri lønir hjá útlendingum. Við omanfyrinevnda broytingaruppskoti skuldi hesin meinbogi kunna beinst burtur.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. apríl 1995. Við 1. viðgerð tann 4. mai 1995 varð málið beint í arbeiðaramálanevndina.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt sig í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin í nevndini (Atli Hansen, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen og Jens av Rana) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, tá eingin orsøk er fyri at broyta galdandi skipan. Arbeiðsgevarin rindar til grunnin av allari útgoldnari løn. Við hesum uppskoti sleppur arbeiðsgevarin undan at rinda fyri tann partin, sum goldin verður til útlendingar, og hesum kann minnilutin ikki taka undir við.

2. viðgerð 22. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum.

3. viðgerð 29. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 70 frá 13. juni 1995.

182 Broyting í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan

Ár 1995, týsdagin 2. mai legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan.

§ 1.

Í Løgtingslóg nr. 34 frá 4. mars 1993 um stuðul til feskfiskaflotan, sum broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 30. mai 1994, verður gjørd henda broyting:
Í § 4, stk. 2, 2. pkt. verður orðið "yngri" strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om støtte til ferskfiskerflåden.

§ 1.

I lagtingslov nr. 34 af 4. marts 1993 om støtte til ferskfiskeflåden, som ændret ved lagtingslov nr. 83 af 30. maj 1994, foretages følgende ændring:
I § 4, stk. 2, 2. pkt. slettes ordet "yngre".

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Frammanfyri standandi uppskot gevur vinnuni betri møguleikar fyri at býta verandi fiskifør um, við tað at treytin um, at farið skal vera yngri, verður slept.

1. viðgerð 4. mai 1995. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 17. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. mai 1995 og eftir 1. viðgerð tann 4. mai 1995 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við Óla Jacobsen, landsstýrismann, sum greiddi nevndini frá málinum. Hann segði, at endamálið við uppskotinum er at geva vinnuni betri møguleikar at býta skip um og harvið møguleikan at varðveita arbeiðspláss. Landsstýrismaðurin legði fyri nevndina yvirlit yvir miðalaldurin á fiskiskipaflotanum yvir 20 BRT pr. 31. desember 1994, sum er 28,4 ár. Miðalaldurin er fyri:

Lemmatrolarar	15,4 ár
Partrolarar	18,8 ár
Línuskip	26,3 ár
Útróðrarfør yvir 20 BRT	36,7 ár

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt sig í ein meiriluta og tveir minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Karl Robert Johansen, Álvur Zachariasen, John Petersen og Jákup Olsen) vísir á, at uppskot landsstýrisins er at strika orðið "yngri" í § 4, stk. 2, 2. pkt. í løgtingslóg nr. 34 frá 4. mars 1993 um stuðul til feskfiskaflotan, sum broytt við Løgtingslóg nr. 83 frá 30. mai 1994. § 4, stk. 2, er soljóðandi: "*Stuðulin kann eftir umsókn verða útgoldin, um veiðuloyvi verður latið landsstýrinum endaliga. Verður fiskifarið umbýtt við annað yngri fiskifar, sum hevur somu ella minni veiðiorku, fylgir stuðulin hjá uppruna fiskifarinum við. Verður fiskifar innflutt, má tað ikki verða eldri enn 10 ár, tó træskip undir 110 BRT ikki eldri enn 20 ár.*" Eisini vísir meirilutin á § 8, stk. 3 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, ið er soljóðandi: "*Veiðiloyvi frá fiskifari, ið er lagt med alla, har ræðisavmarking er skrásett í skipaskránni, ella farið er strikað í skipaskránni, kann verða flutt til innflutt fiskifar við somu ella minni orku og sum ikki er eldri enn 10 ár*". Sambært hesum lógargreinum økir uppskot landsstýrisins ikki um veiðutrýstið og tekur meirilutin tí undir við málinum og mælir løgtinginum at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Jákup Joensen) vísir á, at tað er ikki tilráðiligt at økja um veiðuflotastødd og harvið veiðutrýst í royndum at skapa arbeiðspláss - í hesum føri á sjónum,

heldur enn á landi, serliga nú veiðiflotin liggur sum ræðumynd fyri yvirkapacitet og neyðuga stovnsrøkt.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) førir fram, at endamálið við hesi lógarbroyting er, at innflyta eldri skip (partrolarar) í staðin fyri "yngri", sum eru seld av landinum. Hetta førir tað við sær, at flotin, sum í miðal er ov gamal, verður enn eldri, eftir hann er í dag, við at skrika orðið "yngri". Av tí at hesi skip ikki hava verið í vinnu í seinastuni, kemur henda lógarbroyting at økja munandi um veiðutrýstið, serliga tí at her er talan um tann partin av flotanum, sum hevur tað størsta veiðutrýstið í mun til manningartalið. Hetta eru eisini tey skipini, sum leggja størsta trýsti á landskassan eftir stuðuli.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) gjørdi eina talvu, tá upprunalógin varð samtykt, sum vísti, hvat hvørt arbeiðsplássið kostaði í miðal í fløgustuðuli. Fyri trolaraflotan var talið kr. 112.532,- og fyri húkaflotan var talið kr. 27.224,- í fløgustuðuli uppá mannin. Her er talan um fiskifør omanfyri 20 BRT. Annars verður víst til løgtingsmál nr. 81/1992: Løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan. (Samtykt 26. februar 1993). Tað kundi eisini verið áhugavert at gjørt eina talvu, sum vísti, hvussu nógva kvotu hvørt arbeiðspláss á veiðuflotanum skal hava, um veitt verður við húki ella troli. (Herundir eisini tað búskaparliga avkastið).

Landsstýrismaðurin Óli Jacobsen hevur á fundi við fiskivinnunevndina greitt frá, at landsstýrið við hesum uppskoti vil geva vinnuni betri møguleikar at býta skip um, harvið at varðveita arbeiðspláss. Um uppskotið frá landsstýrinum verður samtykt, kemur hetta at fáa øvugta ávirkan. Tað vil siga, at vit koma at niðurleggja arbeiðspláss. Hetta kemur serliga av tí, at flotin, serliga partrolara flotin, var ov stórur tá uppruna lógin kom í gildi. Tað, sum landsstýrið nú ger, er at seta hesi skip inn aftur í fiskiskapin. Hetta ger tað, at tað verður ov lítið í part hjá partrolarallotanum, sum nú, fýra mánaðir eru eftir av kvotuárinum, er lagdur, tí kvotan er uppfiskað. Tá hava bert 28 skip av 36 skipum, verið í vinnu í árinum. Broytingin kemur at gera tað, at raksturin ikki kemur at hanga saman hjá nøkrum.

Út frá omanfyri standandi viðmerkingum tekur minnilutin (Heini O. Heinesen) ikki undir við uppskoti landsstýrisins og mælir frá at samtykkja tað. Hetta serliga tí at upplýsingarnar frá landsstýrismanninum ikki samsvara við veruleikan.

2. viðgerð 19. mai 1995. Uppskotið samtykt við 21-0 atkvøðum.

3. viðgerð 22. mai 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

Lóg nr. 69 frá 13. juni 1995.

183 Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu

Ár 1995, mikudagin 17. mai legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1995 at borga sum einfaldur borgsmaður fyri lánum til fiskamjøl, lýsi og matsild. Borgan verður givin fyri lánum, ið ikki mugu fara upp um 70% av lánsvirðinum.

§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

lagtingslov om garanti fyri lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1995 at kautionere med simpel kaution for lån til fiskemel, animalsk olie og konsumsild. Kautionen ydes for lån, der ikke må overstige 70% af lånsværdien.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 50 frá 3. mai 1994, sum fór úr gildi 31. desember 1994, sí løgtingsmál nr. 116/1993, og er bert ein endurnýgging av lógini.

Danska fíggjarmálaráðið bevur í desember 1993 góðtikið heimildina til borgan sambæt hesi lóg, hóast avtaluna frá 28. mai 1993, pkt. 4, og metur verður, at henda góðkenning eisini er galdandi fyri 1995.

Í fíggjarárinum 1994 eru borganir veittar fyri 27 mió. kr. til fiskamjøl og lýsi á goymslu.

Vísur verður annars til løgtingsmál nr. 44 frá 7. mai 1963, har fyrsta lógin um goymslulán kom í gildi.

1. viðgerð 19. mai 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mai 1995 og varð við 1. viðgerð 19. mai 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. **Ein samd nevnd** tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 24. mai 1995. Atkvøðugreiðslan útsett.

Við atkvøðugreiðsluna 26. mai 1995 varð uppskotið samtykt við 26-0 atkvøðum.

1. juni 1995 løgdu tingmenninir Finnbogi Arge, Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariasen, Kristian Magnussen og Anfinn Kallsberg fram soljóðandi

Ískoytisálit

Fíggjarnevndin hevur áður lagt álit fram í málinum, og mælti ein samd nevnd tá at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Undirritaðu 5 tinglimir halda, at uppskotið skal fevna um veðhald fyri makrel á goymslu og seta tí soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

1) § 1 verður orðað soleiðis:
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1995 at borga sum einfaldur borgsmaður fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild og makrel. Borgan verður givin fyri lánum, ið ikki mugu fara upp um 70% av lánsvirðinum.

1) § 1 affattes således:
Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1995 at kautionere med simpel kaution for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsild og makrel. Kautionen ydes for lån, der ikke må overstige 70% af lånsværdien.

3. viðgerð 1. juni 1995. Broytingaruppskotið samtykt við 26-0 atkvøðum. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 102 frá 20. juni 1995.

184 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1995, mikudagin 17. mai legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 46 verður stk. 2 orðað soleiðis:

"**Stk. 2.** Rentuútreiðslur av privatari skuld og úreiðslur til provisión, stovningarprovisión ella premiu í sambandi við privata lántøku kunnu dragast fra í tí útroknaða kommunuskattinum við tí í stk. 4 nevndu prosentupphædd av rentuupphæddini. Frádráttur fyri rentuútreiðslur er tó treytaður av, at renturnar eru komnar til gjaldingar aftan á 31.12.1994. Um rentuútreiðslur, sum eru komnar til gjaldingar, og eru frádriguar í einum inntøkuári, ikki eru goldnar við endan av næstkomandi inntøkuári, verður álíkningin fyri inntøkuárið, rentuútreiðslurnar eru komnar til gjaldingar, broytt soleiðis, at rentufrádrátturin í skattinum verður minkaður við skattavirðinum av ikki goldnu rentunum. Um so er, at kommunuskatturin hjá skattskyldugum, sum eru stakir og tann samlaði kommunuskatturin hjá skattskyldugum hjúnum, sum búgva saman, aftaná at prosentupphæddin sambært stk. 4 av samlaðu rentuupphædd teirra er frádrigin, tá vísir hall,

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86. af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

1) I § 46 affattes stk. 2 således:

"**Stk. 2.** Renteudgifter af privat gæld og udgifter til provision, stiftelsesprovision eller præmie i forbindelse med privat låntagning kan fradrages i den udregnede kommuneskat med den i stk. 4 anførte procentdel af rentebeløbet. Fradrag for renteudgifter er dog betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31.12.1994. Såfremt renteudgifter, der er forfaldne til betaling, og som er blevet fradraget i et indkomstår, ikke er betalt i slutningen af næstkommende indkomstår, bliver ansættelsen for indkomståret, hvori renteudgifterne er forfaldne, ændret således, at rentefradraget i skatten bliver formindsket med skatteværdien af de ikke betalte renter. Hvis enlige personers kommuneskat og samlevende ægtefælders samlede kommuneskat, efter at den i stk. 4 anførte procentdel af det samlede rentebeløb er fratrukket, bliver negativ, kan det negative beløb fratrækkes i kommuneskatten i de nærmeste efterfølgende 5 indkomstår således, at det fulde beløb fradrages det

kann hetta verða drigið frá í kommunuskattinum 5 tey næstu inntøkuárini soleiðis, at fyrsta árið verður alt hallið drigið frá, um kommunuskattur er til tess og annars so nógv, sum kommunuskattur er til, fyrstu ferð galdandi fyri hall, sum er staðfest í 1990."

2) Í § 46 verður stk. 3 orðað soleiðis:
"**Stk. 3.** Skattskyldug hjún, sum búgva saman, gera sjálvi av, hvussu samlaða rentuupphæddin sambært stk. 2 skal verða býtt teirra millum. Býtið skal vera tað sama í kommunuskatti sum í landsskatti og skal lutfallsliga vera tað sama í endaligu álíkningini, sum í fyribilsálíkningini. Tann samlaði frádrátturin, tey fáa í kommunuskattinum, kann ikki fara upp um ta í stk. 4 nevndu prosentupphædd av samlaðu rentuupphædd teirra."

3) Í § 46 verður sum nýtt stk. 4 sett:
"**Stk. 4.** Tann árliga procentupphæddin sambært stk. 2 og 3 verður í :
1996-2000: 15 %
frá og við 2001: 13 %"

4) stk. 4 verður hereftir stk. 5.

5) Í § 46 a verður sum nýtt stk. 4 sett:
"**Stk. 4** Tann árliga procentupphæddin sambært stk. 1, 2 og 3 verður í:
1996-2000: 15 %
frá og við 2001: 13 %"

6) Stk. 4 og 5 verða hereftir stk. 5 og 6.

7) Í § 46 a, stk. 1, 2 og 3 verður "13 %" broytt til: "við tí í stk. 4 nevndu prosentupphædd."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er galdandi frá 1. januar 1996.

første år, såfremt det kan dækkes af kommuneskatten og eller så stor en del, der er dækning for i kommuneskatten, første gang med virkning for negative beløb, som er konstateret i 1990."

2) I § 46 affattes stk. 3 således:
"**Stk. 3.** Samlevende ægtefæller, der er skattepligtige, afgør selv, hvorledes det, jfr. stk. 2 opgjorte samlede rentebeløb skal fordeles mellem dem. Fordelingen skal være den samme i kommuneskat som i landsskat og skal forholdsmæssigt være den samme i slutligningen, som i forskudsregistreringen. Ægtefællernes samlede fradrag i kommuneskatten kan ikke overstige den i stk. 4 anførte procentdel af det samlede rentebeløb."

3) I § 46 indsættes som nyt stk. 4:
"**Stk. 4** Den årlige procentdel, jf. stk. 2 og 3 bliver i:
1996-2000: 15 %
fra og med 2001: 13 %"

4) Stk. 4 bliver herefter stk. 5.

5) I § 46 a indsættes som nyt stk. 4:
"**Stk. 4.** Den årlige procentdel, jfr. stk. 1, 2 og 3 bliver i:
1996-2000: 15 %
fra og med 2001: 13 %"

6) Stk. 4 og 5 bliver herefter stk. 5 og 6.

7) I § 46 a, stk. 1, 2 og 3 ændres "13 %" til: "med den i stk. 4 anførte procentdel."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse, og har gyldighed fra 1. januar 1996.

Viðmerkingar:

Vísst verður til felagsviðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 185/1994.

Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 184/1994:
Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um kommunuskatt og landsskatt viðvíkur frádráttinum fyri privatar rentnútreiðslur.

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins ásetur, at skattafrádráttur í kommunuskattinum fyri privatar rentur verður hækkaður í 1996 úr teimum núgaldandi 13 % til 15 %, og síðani lækkaður aftur til 13 %.
Tann árliga prosentupphæddin verður í ár:

1996-2000:	15 %
frá og við 2001:	13 %

Tann samlaða árliga prosentupphæddin (landsskattur og kommunuskattur) verður í ár:

1995:	44 %
1996-2000:	48 %
2001:	44 %
2002:	42 %
frá og við 2003:	40 %

Orsøkin til hesa broyting er, m.a. at teir skattgjaldarar, sum tóku lán til egnan bústað í tíðarskeiðinum frá seinast í 1980'unum til fyrst í 1990'unum eru sera hart fyri fíggjarliga sað, orsakað av stóru samfelagsbroytingunum her á landi. Ein hækking av rentufrádráttinum í kommunuskattinum fer at lætta um hjá omanfyri nevndu skattgjaldarum.

Hækkingin av loyvda rentufrádráttinum í kommunuskattinum er mett til at kosta uml. 7 mill. kr. árliga. Tó er væntandi, at nakað av hesum peningi kemur inn aftur í meirinntøku, tá skattgjaldarar, sum fáa ágóða av hækkingini, fara at hava meira pening til taks.

Orsøkin til samanskrivingina í § 46, stk 2 og 3 er, at tað eru hendar sera nógvar broytingar í hesi greinini innan fyri heilt stutta tíð. Av hesum tykist tað at verða rættast at samanskriva broytingarnar, soleiðis at skattaborgararnir kunnu hava møguleika at kunna seg um galdandi rætt, uttan nakrar misskiljingar. Lógarbroytingin í § 46 er sostatt einans ein broyting av skattafrádráttarprosentinum fyri privatar rentur.

1. viðgerð 22. mai 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 26. mai 1995 legði fram soljóðandi

F e l a g s á l i t

í

løgtingsmáli nr. 184/1994: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt og
í løgtingsmáli nr. 185/1994: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 17. mai 1995 og eftir I. viðgerð 22. mai 1995 beind í skattanevndina.

Í londum, okkum vanliga dámar at verða samanborin við, er vanligt at bera borgarum part av skattinum aftur.

Har, sum bruttoskattur er, verða flytingar gjørdar til tann einstaka borgaran. Í Danmark t.d. fáa foreldur barnastyrk, meðan vit í Føroyum m.a. fáa henda frádrátt í skattinum.

Skattanevndin ásannar, at stórur partur av inntøkuni hjá fólki er bundin til fastar útreiðslur, herundir fyrst og fremst rentur og avdráttir av bústaði.

Undir viðgerðini í tinginum upplýsti Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, at av 12.000 húskjum í landinum, hava 8.000 sethúsalán.

Samlaðu rentuútreiðslurnar av sethúsum eru umleið 500 mió. kr. árliga. Tá rentufrádrátturin í 1996 er komin upp á 48% í mun til núverandi 40, sparir hvørt húski í meðal 5.000 kr. árliga.

Umframt hetta verður ein umfatandi rentunullstilling, sum snýr seg um eini 2000 húski ella 25% av lánmassanum, gjørd.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sune Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen og Finnbogi Ísakson) førir fram:

Meirilutin er samdur um, at tað er ov stórætlað at kalla uppskotini fyri eina setaloysn, men heldur stig á røttu leiðina.

Tí mælir meirilutin tinginum til at samtykkja uppskotini.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:
Løgtingið hevur eftir uppskoti frá fólkaflokkinum samtykt at áleggja landsstýrinum at fáa loyst sethúsatrupulleikan. Nú er landsstýrið komið við hesi sonevndu sethúsaloysn. Loysnin er, at rentufrádrátturin verður hækkaður úr verandi 40% upp í 48%.

Sethúsaloysnin er av sethúsaeigarafelagnum og øðrum samanborin við uppskot fólkafloksins um nýggja skattaskipan í løgtingsmáli nr. 39/94: Hækking av skattafría botnmarkinum og lækking av skattastiganum. Hóast fólkafloksuppskotið ikki er nøkur sethúsaloysn, gevur tað sethúsaeigarum nógv størri lætta enn uppskot landsstýrisins.

Fyri betur at lýsa munin millum verandi skattaskipan, uppskot landsstýrisins og uppskot fólkafloksins, er viðlagt hesum máli 3 skjøl tikin úr álitinum í løgtingsmálinum nr. 39/94.

Skjal 1 sýnir føstu útreiðslurnar, sum Føroya Sparikassi metir eitt húsarhald við tveimum børnum má hava fyri at liva undir rímiligum umstøðum.

Hetta vísir, at einki verður til rentur og avdráttir, uttan so at inntøkan er hægri enn 122.712 kr. aftan á, at skattur er rindaður. Tað svarar til, at inntøkur undir 200.000 kr. ikki kunnu rinda eitt oyra í rentum og tískil heldur ikki kunnu fáa rentufrádrátt.

Skjal 2 vísir somu húsarhald sum í skjali 1 (húsarhald við 2 børnum), sum í hesum føri hava lán upp á 800.000 kr. Hesi skulu við 30 ára annuitetsláni rinda 50.000 kr. í rentum og uml. 13.000 kr. í avdráttum um árið. Her sæst, at rentufrádráttur ikki kemur hesum húskjum til góðar, fyrr enn inntøkan kemur upp um 200.000 kr. og ikki virkar fult, fyrr enn inntøkan er komin upp á 350.000 kr.

Sum sæst gevur uppskot landsstýrisins um sethúsaloysn hesum húsarhaldi í besta føri 4.000 kr. meir um árið t.v.s. 333 kr. um mánaðin, meðan Fólkafloksuppskotið gevur sumu fólkum millum 20.000 - 40.000 kr. meir um árið, eisini teimum, ið ikki klára seg í dag.

Myndin sýnir týdningin av barnafrádráttinum fyri tær heilt lágu inntøkurnar, og tí er í uppskoti fólkafloksins mælt til ein ella annan hátt av samsýning til barnafamiljur.

Skjal 3 sýnir somu húsarhald sum í skjal 1 (húsarhald við 2 børnum), sum í hesum føri hava lán upp á 1.100.000 kr. Hesi skulu við 30 ára annuitetsláni rinda 75.000 kr. í rentum og uml. 15.000 kr. í avdrátti um ári. Her sæst, at rentufrádráttur ikki kemur hesum húskjum til góðar, fyrr enn inntøkan kemur upp um 200.000 kr., og ikki virkar fult, fyrr enn inntøkan hjá húsarhaldinum er komin upp á 450.000 kr.

Sum sæst, gevur uppskot landsstýrisins um sethúsaloysn hesum húsarhaldi í besta føri 6.000 kr. meir um árið, t.v.s. 500 kr. um mánaðin, meðan fólkafloksuppskotið gevur somu fólkum millum 20.000 - 30.000 kr. meir um árið.

Hesi skjøl vísa týðiliga, at uppskot landsstýrisins als ikki hjálpir teimum, ið veruliga tørva hjálp. Men at tey, sum frammanundan klára seg, fáa ein skattalætta. Øll hava brúk fyri einum skattalætta, men tað er ómoralskt hjá landsstýrinum at koma við eini sonevndari "sethúsaloysn", har tey, ið ikki klára seg framhaldandi skulu knokkroytast við skatti, meðan lætt verður um hjá teimum sethúsaeigarum, sum frammanundan klára seg.

Hinvegin er fólkafloksuppskotið ein skattaskipan, sum gevur teimum hart kroystu størsta lættan, meðan hini fáa ein heldur minni lætta.

Nógv eru tey, ið halda, at frádráttir í skattinum geva rættvísi og hjálpa teimum, ið tørva. Taka vit verandi skattaskipan sum dømi, har vit hava frádráttir av øllum handa slag, síggja vit júst tað mótsatta. Tað eru tær høgu inntøkurnar í samfelagnum, sum hava pening til yvirs, ið kunnu plasera sín pening, har hann gevur frádrátt í skattinum, meðan lág- og miðalinntøkurnar ikki hava pening til taks, ið kann plaserast, har

frádráttur fæst. Úrslitið er, at háinntøkurnar rinda lítið og einki í skatti, og tí eru lág- og miðalinntøkurnar brandskattaðar fyri at fáa nakað í landskassan.

Frádráttir geraójavna og ónøgd millum borgarar og eiga tí sum skjótast at fáast burtur. Hetta er einasti báttur at koma burturúr verandi ótolandi skattatrýsti, sum drepur hugin hjá fólki at arbeiða og forvinna. Eftir uppskoti landsstýrisins verður marginalskatturin (skattur av seinast vunnu krónu) framvegis 70%, hetta, sum tekur hugin hjá fólki at arbeiða, og tískil steðgar øllum framburði.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) mælir við hesum viðmerkingum løgtinginum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins, men setir fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri løgtingið uppskot um, hvussu vit fáa tikið burtur allar frádráttir, og har ynski er til tess, at geva samsýning t.d. til barnafamiljur og harvið leggja um til eina bruttoskattaskipan.

2. viðgerð 29. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskot minnilutans fall við 12-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

Lóg nr. 101 frá 20. juni 1995.

185 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1995, mikudagin 17. mai legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4 verður orðað soleiðis:

"**§ 4.** Rentuútreiðslur av privatari skuld og útreiðslur til provisión, stovningarprovisión ella premiu í sambandi við privata lántøku kunnu dragast frá í tí útroknaða landsskattinum við tí í stk. 3 nevndu procentupphædd av rentuupphæddini. Frádráttur fyri rentuútreiðslur er tó treytaður av, at renturnar eru komnar til gjaldingar aftan á 31.12.1994. Um rentuútreiðslur, sum eru komnar til gjaldingar, og eru frádrignar í einum inntøkuári, ikki eru goldnar við endan av næstkomandi inntøkuári, verður álíkningin fyri inntøkuárið, rentuútreiðslurnar eru komnar til gjaldingar, broytt soleiðis, at rentufrádráttur í skattinum verður minkaður við skattavirðinum av ikki goldnu rentunum. Um so er, at landsskatturin hjá skattskyldugum, sum eru stakir og tann samlaði landsskatturin hjá skattskyldugum hjúnum, sum búgva saman, aftaná at procentupphæddin sambært stk. 3 av samlaðu rentuupphædd teirra er frádrigin, tá vísir hall, kann hetta verða drigið frá í landsskattinum 5 tey

lagtingslov om ændring i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.

§ 1.

I lagtingslov nr. 87. af 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændring:

1) § 4 affattes således:

"**§ 4.** Renteudgifter af privat gæld og udgifter til provision, stiftelsesprovision eller præmie i forbindelse med privat låntagning kan fradrages i den udregnede landsskat med den i stk. 3 anførte procentdel af rentebeløbet. Fradrag for renteudgifter er dog betinget af, at renterne er forfaldne til betaling efter 31.12.1994. Såfremt renteudgifter, der er forfaldne til betaling, og som er blevet fradraget i et indkomstår, ikke er betalt i slutningen af næstkommende indkomstår, bliver ansættelsen for indkomståret, hvori renteudgifterne er forfaldne, ændret således, at rentefradraget i skatten bliver formindsket med skatteværdien af de ikke betalte renter. Hvis enlige personers landsskat og samlevende ægtefællers samlede landsskat, efter at den i stk. 3 anførte procentdel af det samlede rentebeløb er fratrukket, bliver negativ, kan det negative beløb fratrækkes i landsskatten i de nærmeste efterfølgende 5 indkomstår således, at det fulde beløb fradrages det første år, såfremt det kan

næstu inntøkuárini solciðis, at fyrsta árið verður alt hallið drigið frá, um landsskattur er til tess og annars so nógv, sum landsskattur er til, fyrstu ferð galdandi fyri hall, sum er staðfest í 1990.

Stk. 2 Skattskyldug hjún, sum búgva saman, gera sjálvi av, hvussu samlaða rentuupphæddin sambært stk. 1 skal verða býtt teirra millum. Býtið skal vera tað sama í kommunuskatti sum í landsskatti og skal lutfalsliga vera tað sama í endaligu álíkningini, sum í fyribilsálíkningini. Tann samlaði frádrátturin, tey fáa í landsskattinum, kann ikki fara upp um tað í stk. 3 nevndu procentupphædd av samlaðu rentuupphædd teirra.

Stk. 3 Tann árliga procentupphæddin sambært 1. og 2. stk. verður í :

1995:	31 %
1996-2000:	33 %
2001:	31 %
2002:	29 %
frá og við 2003:	27 %"

2) Í § 4 a verður sum nýtt stk. 4 sett:
"**Stk. 4.** Tann árliga procentupphæddin sambært stk. 1, 2 og 3 verður í:

1995:	31 %
1996-2000:	33 %
2001:	31 %
2002:	29 %
frá og við 2003:	27 %"

3) Stk. 4 og 5 verða hereftir stk. 5 og 6.
4) Í § 4 a, stk. 1, 2 og 3 verður "27 %" broytt til: "við tí í stk. 4 nevndu procentupphædd."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir at hon er kunngjørd, og er galdandi frá 1. januar 1995.

dækkes af landsskatten og eller så stor en del, der er dækning for i landsskatten, første gang med virkning for negative beløb, som er konstateret i 1990.

Stk. 2. Samlevende ægtefæller, der er skattepligtige, afgør selv, hvorledes det, jfr. stk. 1 opgjorte samlede rentebeløb skal fordeles mellem dem. Fordelingen skal være den samme i kommuneskat som i landsskat og skal forholdsmæssigt være den samme i slutligningen, som i forskudsregistreringen. Ægtefællernes samlede fradrag i landsskatten kan ikke overstige den i stk. 3 anførte procentdel af det samlede rentebeløb.

stk. 3. Den årlige procentdel, jf. stk. 1 og 2 bliver i:

1995:	31 %
1996-2000:	33 %
2001:	31 %
2002:	29 %
fra og med 2003:	27 %"

2) I § 4 a indsættes som nyt stk. 4:
"**Stk. 4.** Den årlige procentdel, jfr. stk. 1, 2 og 3 bliver i:

1995:	31 %
1996-2000:	33 %
2001:	31 %
2002:	29 %
fra og med 2003:	27 %"

3) Stk. 4 og 5 bliver herefter stk. 5 og 6.
4) I § 4 a, stk. 1, 2 og 3 ændres "27 %" til "med den i stk. 4 anførte procentdel."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse, og har gyldighed fra 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Felagsviðmerkingar til løgtingsmálini nr. 184/1994, 185/1994 og 186/1994:
Landsstýrið ásannaði longu í samgonguskjalinum, at sethúsaskuldin er ein samfelagstrupulleiki, sum má verða loystur í samráð við lánistovnarnar, soleiðis at fólk kunnu verða búgvandi í egnum húsum.

Føroya Løgting heitti á landsstýrið um at kanna, hvussu peningur, sum Føroya Banki hevur avsett móti tapi í sethúsaskuld, kann aktiverast fyri at lætta um fíggjarstøðuna hjá sethúsaeigarunum.

Tað hevur verið fört fram, at landsstýri og løgting bert skulu syrgja fyri, at sethúsaeigarar fáa skuld sína eftirgivna, og loysa trupulleikar teirra á henda hátt.

Tíverri hevur politiskt verið róð uppundir síkar loysnir.

Veruleikin er, at tað er í stríð við grundlógina, um landsstýri og løgting fara inn sum triði partur og niðurskriva skuld hjá húskjum til peningastovnarnar, tí talan er um at niðurskriva eitt krav uttan endurgjald. T.v.s. tað ber ikki til at tvangsniðurskriva skuld, men kann hetta bert fara fram sambært avtalu millum lántakara og lángevara.

Landsstýrið og lánistovnarnir hava síðan januar mánað arbeitt við eini ætlan, ið skal bøta um viðurskiftini hjá teimum mest skuldarbundnu sethúsaeigarunum við rentunulstilling og hækking av rentufrádráttinum.

Lánistovnarnir hava greitt frá, at teir gera eina skipan, har støði verður tikið í fyrru sethúsaloysnini. Peningastovnarnir fara í dag at greiða nærri frá hesi ætlan í einum tíðindaskrivi.

Bøtt verður um viðurskiftini hjá teimum, ið eru í skipanini, og fleiri verða tikin við í skipanina. Ætlanin er at gera eina umfatandi rentunullstilling, sum skal geva húskjunum undir skipanini meir pening millum hendur. Hesin tiltakspeningur kann bæði brúkast til at bøta um livikorini og eina skjótari afturgjalding av skuld enn annars møguligt.

Aftanfyri hesa ætlan er ein ásannan av, at ofta er ov lítið eftir at liva fyri hjá húskjunum við tí í mun til inntøkuna stóru skuldini, og at neyðugt er, at hesi húski fáa ein møguleika fyri eini hóskandi afturgjalding av skuldini.

Rentunulstillingin ger, at skattainntøkurnar økjast munandi, tí skattaborgararnir fáa færri rentur at draga frá í skattinum. Landskassin fær eina meirinntøku uppá 13 mió. kr. og kommunukassarnir eina meirinntøku uppá 6,2 mió. kr. árliga frá 1996 at rokna.

Vísst verður annars til hjálagda fylgiskjal um væntaðu fíggjarligu fylgjurnar av sethúsaloysnini.

Landsstýrið hevur avgjørt at medvirka til at lætta um skuldarbyrðuna hjá sethúsacigararunum við at hækka rentufrádráttarrættin úr 40 uppí 48 prosent, svarandi til eina lækking í landsskattinum uppá 21 mió. kr. og lækking í kommunuskattinum uppá 7 mió. kr.

Um landsstýrið ikki hækkar rentufrádráttin, missa lántakararnir ein stóran part av rentunulstillingini í øktum skatti.

Rentunulstillingin fer væntandi at minka um yvirskotið hjá Húsalánsgrunninum við umleið 16 mió. kr. Aftaná hesa inntøkuminking fer Húsalánsgrunnurin væntandi at hava eitt hall uppá 7-10 mió. kr. í 1996. Fyri at viga upp ímóti hesum halli, má landskassin veita Húsalánsgrunninum ein stuðul uppá útvið 10 mió. kr. árliga komandi árini. Um sethúsaloysnin eydnast, og sethúsacigarar klára at gjalda skuld sína aftur, kann stuðulin til Húsalánsgrunnin minkast so við og við, tí lán verða inntøkuført, sum grunnurin hevur avsett uppá.

Ætlanin er at rentufrádrátturin skal vera 48 prosent fram til ár 2000, síðan verður hann minkaður niður aftur á 40 prosent eftir trimum árum.

Landsstýrið leggur samstundis fram uppskot um hækking av rentuavgjaldi á innlánum í útlendskum peningastovnum. Hetta verður gjørt fyri at fáa tryggari og javnari rentuviðurskifti á føroyska peningamarknaðinum. Í dag kappast føroysku peningastovnarnir við teir donsku um innlán frá partafeløgum, feløgum og almennum grunnum. Landsstýrið hevur avgjørt at veita eina ávísa kappingarverju í nøkur ár, so rentan, orsakað av kapping uttanífrá, ikki skal hækka og lækka í sama mun, sum hon ger í útlondum. Eitt javnt rentustøði er ein fortreyt fyri at sethúsaloysnin skal hava trúvirði sum ein varandi loysn.

Tað er landsstýrinum greitt, at ikki allir trupulleikar verða loystir við hesum uppskoti. Hartil eru trupulleikaruir í føroyska samfelagnum og hjá einstøku húskjunum alt ov stórir.

Framlagda uppskot til loysn er ætlað at geva teimum mest skuldarbundnu møguleikan at gjalda skuld sína aftur og samstundis liva undir sømiligum korum.

Landsstýrið leggur samstundis alla orku í at loysa teir grundleggjandi samfelagstrupulleikarnar nevniliga vinnuloysi, fráflyting, høgt skatta- og avgjaldstrýst orsakað av stóru uttanlandsskuldini.

Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 185/1994:
Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um ásetting av skatti til landskassan viðvíkur frádráttinum fyri privatar rentutreiðslur.

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins ásetur, at skattafrádrátturin í landsskattinum fyri privatar rentur stigvíst verður hækkaður úr teimum núgaldandi 27 % til 33 %, og síðani í stigum lækkaður aftur til 27 %.

Tann árliga prosentupphæddin verður í:

1995:	31 %
1996-2000:	33 %
2001:	31 %
2002:	29 %
frá og við 2003:	27 %

Tann samlaða árliga prosentupphæddin (landsskattur og kommunuskattur) verður í ár:

1995:	44 %
1996-2000:	48 %
2001:	44 %
2002:	42 %
frá og við 2003:	40 %

Orsøkin til hesa broyting er, t.d. at teir skattgjaldarar, sum tóku lán til egnan bústað í tíðarskeiðinum frá seinast í 1980´unum til fyrst í 1990´unum eru sera hart fyri fíggjarliga sæð, orsakað av stóru samfelagsbroytingunum her á landi. Ein hækking av rentufrádráttinum í landsskattinum fer at lætta munandi um hjá omanfyri nevndu skattgjaldarum.

Verður rentufrádráttur**in** hækkaður við einum prosenti , kostar hetta landskassanum ella kommunukassunum umleið 3,5 mió. kr.

Hækkingin av loyvda rentufrádráttinum við 4% í 1995 er sostatt mett at kosta landskassanum uml. 14 mió. kr. Hækkingin av rentufrádráttinum í landsskattinum við 6% kostar landskassanum 21 mió. kr. og hækkingin av rentufrádráttinum í kommunuskattinum uppá 2% kostar kommununum 7 mió. kr. Tó er væntandi, at nakað av hesum peningi kemur inn aftur sum meirinntøka til landskassan, tá skattgjaldarar, sum fáa ágóða av hækkingini, fara at hava meira pening til taks.

Orsøkin til at § 4 er samanskrivað er, at tað eru hendar sera nógvar broytingar í hesi grein innan fyri heilt stutta tíð. Av hesum tikist tað at verða rættast at samanskriva broytingarnar, soleiðis at skattaborgararnir kunnu hava møguleika at kunna seg um galdandi rætt, uttan misskiljing. Lógarbroytingin í § 4 er sostatt einans ein broyting av skattafrádráttarprosentinum fyri privatar rentur.

1. viðgerð 22. mai 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 26. mai 1995 legði fram felagsálit.

Sí felagsálit í tingmáli 184/1994.

2. viðgerð 29. mai 1995. Uppskotið samtykt við 22-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 100 frá 20. juni 1995.

186 Broyting í løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald

Ár 1995, mikudagin 17. mai legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 15 frá 1. februar 1995 um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald verður gjørd hendan broyting:

§ 11 verður orðað soleiðis:

"**§ 11.** Fyri fysiskar persónar, sum koma undir avgjaldsskyldu eftir reglunum í § 4, er rentuavgjaldið av ognarvinningi fevnt av § 2, nr. 2, 15% av ognarvinninginum.

Stk. 2. Fyri juridiskar persónar, sum koma undir avgjaldsskyldu eftir reglunum í § 4, stk. 1 og stk. 2, er rentuavgjaldið av ognarvinningi fevnt av § 2, nr. 2, 35% av ognarvinninginum."

§ 2

Hendan løgtingslóg fær gildi 1. juli 1995 og hevur gildi fyri ognarvinning fevndur av § 2, nr. 2, í løgtingslóg nr. 15 frá 1. februar 1995 um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald, sum eru innvunnin frá og við gildiskomudegnum á hesi broytingarlóg.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om renteafgift og afgift på finansielle aktiver.

§ 1.

I lagtingslov nr. 15 af 1. februar 1995 om renteafgift og afgift af finansielle aktiver foretages følgende ændring:

§ 11 affattes således:

"**§ 11.** For fysiske personer, der er under afgiftspligt efter reglerne i § 4, er renteafgiften af formueafkast omfattet af § 2, nr. 2, 15% af formueafkastet.

Stk. 2. For juridiske personer, der er under afgiftspligt efter reglerne i § 4 stk. 1 og 2 er renteafgiften af formueafkast omfattet af § 2, nr. 2, 35% af formueafkastet."

§ 2

Denne lagtingslov træder i kraft 1. juli 1995 og har virkning for formueafkast omfattet af § 2, nr. 2, i lagtingslov nr. 15 af 1. februar 1995 om renteafgift og afgift af finansielle afgifter, som er optjent fra og med ikrafttrædelsesdagen af denne ændringslov.

Viðmerkingar:

Vísst verður til felagsviðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 185/1994.

Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 186/1994:
Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg nr. 15. frá 1. februar 1995 um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald viðger avgjaldsviðurskiftini fyri ta ogn, sum avgjaldsskyldug hava í útlandinum, og sum kemur undir avgjaldsskyldu eftir reglunum í nevndu løgtingslóg.

Broytingin er uppskot um at hækka avgjaldið fyri avgjaldsskyldug feløg úr teimum núgaldandi 15% í 35%, meðan persónar framhaldandi rinda 15% av útlendskum ognarvinningi.

Landsstýrið ásannar, at ein tílík avskerming av føroyska kapitalmarknaðinum ikki er heppin, og arbeiðir ímóti uppá nakað longri sikt at fáa tikið hana av.

Landsstýrið ásannar eisini, at tá tað orsakað av kreppuni uppá styttri sikt verður neyðugt at varðveita nevndu avskerming, eigur hetta tó at verða gjørt á ein tílíkan hátt, at tað ikki verður so stórur munur millum effektivu skattingina hjá feløgum og fysiskum persónum, og er hetta orsøkin til, at skotið verður upp at hækka rentuavgjaldið, ið avgjaldsskyldug feløg gjalda fyri plaseringar uttanlands úr 15% í 35%.

Sum kunnugt eru peningastovnar við føstum rakstrarstað í Føroyum, Tryggingarsambandið Føroyar og allar deildir tess og Føroya Lívstrygging undantikin at gjalda rentuavgjald og fíggjarognaravgjald. Hetta merkir, at nevnda hækking bert fær týdning fyri tað, sum partafeløg og onnur feløg og felagsskapir hava plaserað uttanlands, og vil tí ikki koma at geva landskassanum stórvegis eykainntøku, men fer vónandi at merkja, at ikki meira peningur verður fluttur av landinum, og at nakað av tí peningi, sum longu er fluttur av landinum, verður fluttur heimaftur.

Niðanfyri standandi talva vísir, hvussu nógv er eftir av rentuni, tá rentuskattur og fíggjarognaravgjald er farið av fyri

I Persónar við 67,5% marginalskatti
II Persónar við 57% marginalskatti
III Partafeløg við 27% skatti, galdandi reglur
IV Partafeløg við 27% skatti, uppskot

	I	II	III	IV
Føroyskur peningastovnur				
12 mánaða uppsøgn 4%	2,00	2,00	2,32	2,32
Ábyrgdari/partaeigari 5,25%	2,81	2,81	3,23	3,23

	I	II	III	IV
Danskur peningastovnur:				
Avtalukonti 4%	0,70	1,12	2,32	1,52
Avtalukonti 5,25%	0,92	1,47	3,05	2,00

Í omanfyri standandi talvu er roknað við somu rentusatsum fyri innistandandi í Danmark og Føroyum, men í løtuni er møguligt at fáa hægri rentu í Danmark enn í Føroyum.

1. viðgerð 22. mai 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 26. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. mai 1995 og eftir 1. viðgerð 22. mai 1995 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sunc Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Karl Robert Johansen og Finnbogi Ísakson) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Jørgen Niclasen) hevur hesar viðmerkingar.
Bankasamanlegging er veruleiki, og vit hava í Føroyum bert ein banka. Nú letst landsstýrið við hesum uppskoti at vilja tryggja, at allur peningur, partafeløg kunnu spara upp til konsolidering, skal setast í føroyska bankan.

Við hesum uppskoti skal leggjast eitt ovurstórt avgjald á rentur av peningi innistandandi í útlendskum peningastovni. Samlað verða nú skattur og avgjøld á áðurnevndu rentum omanfyri 75%. Vert er at býta merki í, at hetta ovurstóra avgjald til landskassan verður galdandi fyri øll partafeløg í Føroyum uttan P/F Føroya Banka.

P/F Føroya Banki er í dag sera trokur at nýta sín ovurstóra likviditet til føroyskt vinnulív, men ynskir heldur at lata hann renta í útlandinum. Endamálið við uppskoti landsstýrisins er at fyribyrgja, at meira peningur verður fluttur av landinum og at nakað av tí peningi, sum longu er fluttur av landinum, verður fluttur heimaftur, hetta fyri at halda rentustøðinum í Føroyum niðri.

Minnilutin heldur tað verða sera óheppið við lóg at avgera, um tað skulu verða vanlig partafeløg, ella tað skal verða bankin, ið plaserar pening í útlandinum.

Landsstýrið tykist longu hava gloymt síni egnu lánsbrøv. Landsstýrið bjóðar fólki og feløgum 2 ferð so høga rentu, sum føroysku peningastovnarnir kunnu bjóða. Nú verður alt gjørt fyri at varðveita henda mun. Landsstýrið átti heldur at umhugsa sín politikk við lánsbrøvum, sum við tíðini gerst ein alt størri og størri hóttan á føroyska rentustøðið, ístaðin fyri at halda føroysku rentuni niðri við at áleggja eyka avgjøld á útlendska rentu.

Spurningurin, sum í hesum sambandi eigur at verða reistur, er: Hvat sigur ES? Hava vit loyvi við ES-sáttmálanum at áleggja "verjutoll" á peningaflutning?

Minnilutin mælir við omanfyri nevndu viðmerkingum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 29. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

Lóg nr. 103 frá 20. juni 1995.

187 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1995, fríggjadagin 19. mai legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, frum soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:
Í § 29, nr. 10) verður sum nýtt 2. punktum sett:
"Sømdarpeningur eftir hesi áseting umfatar eisini eyka sømdarpening sambært lóg nr. 314 frá 17. mai 1995 um "udbetaling af en ekstraordinær hædersgave i anledning af 50-året for Danmarks befrielse""

§ 2

Henda lóg fær gildi 1. juni 1995, og er galdandi fyri teir persónar sum hendan dag hava rætt til sømdarpening eftir § 29 nr. 10), 1. punktum.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:
I § 29 nr. 10) indsættes som nyt punkt 2.:
"Hædersgaver efter denne bestemmelse omfatter også ekstraordinær hædersgave, jfr. lov nr. 314 fra 17. maj 1995 om "udbetaling af en ekstraordinær hædersgave i anledning af 50-året for Danmarks befrielse""

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. juni 1995, og finder anvendelse for de personer, der denne dato er berettiget til hædersgave efter § 29, nr. 10), punkt 1.

Viðmerkingar:

Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt viðvíkur útgjalding av eyka sømdarpeningi í samband við at 50 ár eru farin síðani Danmark fekk frælsi.

Fyriliggjandi uppskot ásetur, at eykaútgjaldingin av sømdarpeningi, eins og sømdarpeningurin, ikki skal teljast við til skattskyldugu inntøkuna. Hetta merkir, at persónar, sum tann 1. juni 1995 hava rætt til sømdarpening eftir nógaldandi § 29, nr. 10), ikki verða skattaðir av tí útgjalding teir fáa sambæt fólkatingslóg nr. 314 frá 17. maj 1995 "om udbetaling af en ekstraordinær hædersgave i anledning af 50 - året for Danmarks befrielse". Fyriliggjandi uppskot umfatar eisini teir persónar, sum aftaná 1. juni 1995 fáa tillutaðan sømdarpening við gildi frá 1. juni 1995 ella einum degi frammanundan 1. juni 1995, av tí at hesir persónar eisini eru umfataðir av lóg nr. 314 frá 17. mai 1995 um "udbetaling af en ekstraordinær hædersgave i anledning af 50 - året for Danmarks befrielse".

Lógarbroytingin er ein fylgibroyting av omanfyri nevndu lóg.

1. viðgerð 22. mai 1995. Málið varð beint í skattanevndina, sum 24. mai 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. mai 1995 og eftir 1. viðgerð tann 22. mai 1995 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 26. mai 1995. Uppskotið samtykt við 23-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

Lóg nr. 99 frá 20. juni 1995.

188 Løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprióvtøku v.m.

Ár 1995, týsdagin 30. mai legði mentannar- og skúlanevndin fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprióvtøku v.m.

Kapittul 1
HF-útbúgving

§ 1. Skeið til hægri fyrireikingarprióvtøku er ein almennandi og lestrarfyrireikandi útbúgving fyri tilkomin.
Stk. 2. Lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing er eitt tilboð til tilkomin um fskoytisútbúgving á fleiri stigum.

Kapittul 2

Skeið til hægri fyrireikingarprióvtøku

§ 2. Á skeiði til hægri fyrireikingarprióvtøku verður undirvíst í alisfrøði, alisfrøði-evnafrøði, donskum, enskum, evnafrøði, evning, films- og sjónvarpskunnleika, fiskivinnu, fornaldarfrøði, fronskum, føroyskum, geografi, heimspeki, ítrótti, lívfrøði, religión, russiskum, sálarfrøði, samfelagsfrøði, spanskum, støddfrøði, søgu, teldufrøði, tónleiki, týskum, tøkni og vinnulívsbúskapi. Næmingarnir skulu harumframt hava útbúgvingar- og yrkisvegleiðing.
Stk. 2. Landsstýrið kann góðkenna, at undirvísing verður givin í øðrum lærugreinum.

lagtingslov om kursus til højere forberedelseseksamen m.m.

Kapitel 1
HF-uddannelse

§ 1. Kursus til højere forberedelseseksamen er en almendannende og studieforberedende undervisning for voksne.
Stk. 2. Studieforberedende enkelt fagundervisning er et tilbud til voksne om suppleringsuddannelse på flere niveauer.

Kapitel 2

Kursus til højere forberedelseseksamen

§ 2. Ved kursus til højere forberedelseseksamen undervises der i fysik, fysik-kemi, dansk, engelsk, kemi, billedkunst, film- og fjernsynskundskab, fiskeri, oldtidskundskab, fransk, færøsk, geografi, filosofi, idræt, biologi, religion, russisk, psykologi, samfundsfag, spansk, matematik, historie, datalogi, musik, tysk, teknologi og erhvervsøkonomi. Eleverne skal herudover have uddannelses- og erhvervsvejledning.
Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om, at der bliver undervist i andre fag.

§ 3. Hægri fyrireikingarprávtøka gevur atgongd til hægri framhaldslestur.
Stk. 2. Landsstýrið ásetur nærri reglur um skeið til hægri fyrireikingarprávtøku, heruppií hvørjar lærugreinir, ið eru felagslærugreinir og hvørjar, ið eisini ella bert eru vallærugreinir. Landsstýrið ásetur minsta krav til talið og samansetingina av vallærugreinum, ið saman við felagslærugreinunum mynda eina samlaða právtøku hjá tí einstaka næminginum.
Stk. 3. Landsstýrið kann áseta reglur um, at lærugrein á sama ella hægri stigi á gymnasialum støði kann koma í staðin fyri lærugrein til HF-právtøku.
Stk. 4. HF-útbúgvingin kann takast sum eitt samlað 2-ára skeið ella leggjast til rættis sum stakgreinaundirvísing.

§ 3. Højere forberedelseseksamen giver adgang til højere videregående studier.
Stk. 2. Landsstyret fastsætter nærmere regler om kursus til højere forberedelses eksamen, herunder hvilke fag, der er fællesfag, og hvilke der også eller blot er valgfag. Landsstyret fastsætter minimumskrav til antallet og sammensætning af valgfag, der sammen med fællesfagene udgør en samlet eksamen for den enkelte elev.
Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte regler om, at fag til HF-eksamen kan erstattes af samme fag på tilsvarende eller højere gymnasialt niveau.
Stk. 4. HF-uddannelsen kan tages som et samlet 2-års HF-kursus eller lægges til rette som enkeltfagsundervisning.

Kapittul 3

Lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing

§ 4. Lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing fevnir um tær lærugreinir og tey støði, sum eru partur av hægri fyrireikingarprávtøku sambært § 2. Eisini kann verða undirvíst í lærugreinum, sum eru við í lærugreinarøðini á studentaskúlanum, heruppií lærugreinir á hástigi sambært løgtingslóg um studentaskúlaútbúgving og stakgreinalestur á studentaskúlastigi.

§ 5. Lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing gevur við undirvísing í einstøkum lærugreinum ella í útbúgvingarskeiðum, sum eru løgd serliga til rættis, tilkomnum grundarlag fyri framhaldandi útbúgving. Eisini gevur lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing tilkomnum møguleika fyri at taka fskoytisútbúgving til áður tiknar útbúgvingar ella fyri at bøta um vinnumøguleikar sínar.

Kapitel 3

Studieforberedende enkeltfagsundervisning

§ 4. Studieforberedende enkeltfagsundervisning omfatter de fag og de niveauer, som indgår i højere forberedelseseksamen, jfr. § 2. Endvidere kan der undervises i fag, der er med i gymnasiets fagrække, herunder fag på højniveau, jfr. lagtingslov om gymnasieuddannelse og enkeltfagsundervisning på gymnasieniveau.

§ 5. Studieforberedende enkeltfagsundervisning giver gennem undervisning i enkelte fag eller i uddannelsesforløb, der er specielt tilrettelagt, voksne grundlag for videregående uddannelse. Studieforberedende enkeltfagsundervisning giver også voksne mulighed for at supplere tidligere uddannelser eller for at forbedre deres erhvervsmuligheder.

Stk. 2. Prøvtøkur í einstøkum lærugreinum í HF-lærugreinarøðini kunnu setast saman til eina hægri fyrireikingarprøvtøku sambært § 3.
Stk. 3. Prøvtøkur í einstøkum lærugreinum í lærugreinarøðini á studentaskúlanum kunnu setast saman til studentsprøvtøku eftir nærri reglum, sum landsstýrið áseetur.

Kapittul 4

Felags áseetingar

§ 6. Landsstýrið áseetur nærri reglur fyri undirvísingini, heruppií innihaldið og vavið í teimum einstøku lærugreinunum, og á hvørjum stigi lærugreinirnar verða. Hevur ein lærugrein fleiri stig, kann haldast fram frá lægri til hægri stig. Fyri at halda fram frá lægri til hægri stig í eini lærugrein, skal næmingurin hava verið til prøvtøku á tí lægra stignum.
Stk. 2. Undirvísingin í hvørjari lærugrein sambært § 3 endar við prøvtøku, undantiknar eru lærugreinirnar evning, ítróttur og tónleikur sum felagslærugreinir í einum samlaðum 2-ára HF-skeiði.
Stk. 3. Næmingar, ið ikki hava tikið lut í undirvísingini til hægri fyrireikingarprøvtøku ella í lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing kunnu fara til prøvtøku sum sjálvlesandi.

§ 7. Landsstýrið áseetur gjøllari reglur fyri HF-prøvtøku, herímillum reglur um krøv og prøvtøkuuppgevingar, prøvtøkur, prøvdøming, prøvtøl umframt útskriving av prógvi.
Stk. 2. Kæra um avgerðir tiknar í sambandi við prøvtøku, herundir um áseting av prøvtali, kann innan 2 dagar aftaná at avgerðin er kunngjørd næminginum leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum.

Stk. 2. Eksaminer i enkelte fag i HF-fagrækken kan sættes sammen til en højere forberedelseseksamen, jfr. § 3.
Stk. 3. Eksaminer i enkelte fag i gymnasiets fagrække kan sættes sammen til studentereksamen efter nærmere regler, som fastsættes af landsstyret.

Kapitel 4

Fælles bestemmelser

§ 6. Landsstyret fastsætter nærmere regler for undervisningen, herunder indhold og omfang af de enkelte fag, og på hvilket niveau, fagene er. Har et fag flere niveauer, kan der fortsættes fra et lavere til et højere niveau. For at fortsætte på et højere niveau i et fag, skal eleven have været til eksamen på det lavere niveau.
Stk. 2. Undervisningen i hvert fag i henhold til § 3 afsluttes med eksamen, bortset fra fagene billedkunst, idræt og musik i et samlet 2-åring HF-forløb.
Stk. 3. Elever, der ikke har deltaget i undervisningen til højere forberedelseseksamen eller i studieforberedende enkeltfagsundervisningen, kan gå til eksamen som selvstuderende.

§ 7. Landsstyret fastsætter nærmere regler for HF-eksamen, herunder regler om krav, pensumopgivelse, eksaminer, censur, karakterer og udstedelse af eksamensbevis.
Stk. 2. Klage over afgørelser, truffet i forbindelse med eksamen, herunder fastsættelse af karakter, kan inden 2 dage efter, at afgørelsen er bekendtgjort for eleven, indbringes for Skúlafyrisitingin efter regler, fastsat af landsstyret. Skúlafyrisitingin's afgørelser kan ikke ind-

ið landsstýrið ásetur. Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

§ 8. Einstaka næminginum, verður boðin útbúgvingar- og yrkisvegleiðing eftir reglum, ið landsstýrið ásetur.

§ 9. Brekaðir næmingar fáa serliga undirvísing ella sernámsfrøðiliga hjálp eftir reglum, ið Skúlafyrisitingin ásetur.
Stk. 2. Fyri næmingar, sum vegna sjúku ikki kunnu fylgja vanligari undirvísing í longri tíð, verða undirvísingartiltøk framd eftir reglum um sjúkraundirvísing, ið landsstýrið ásetur.

Kapittul 5
Upptøka

§ 10. Umsøkjari kann verða tikin upp á 2 ára HF-skeið til hægri fyrireikingarprøvtøku, um
1) umsøkjarin er fyltur 18 ár áðrenn 1. august í tí ári, hann byrjar undirvísingina, og
2) umsøkjarin hevur lokið 10. flokk fólkaskúlans og lokið víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans í føroyskum og donskum, og fráfaringaringarroynd fólkaskúlans í lærugreinunum støddfrøði og enskum.
Stk. 2. Umsøkjarar, ið ikki lúka upptøkutreytirnar eftir stk. 1, nr. 2, kunnu tó takast upp eftir meting rektarans/skeiðleiðarans av persónligum og fakligum dygdum hjá umsøkjaranum.

§ 11. Umsøkjari kann verða tikin upp til lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing sambært reglunum í § 10, stk. 1 og 2.

§ 12. Upptøka til undirvísing, sum í einari lærugrein førir til hægsta gymnasiala stig

bringes for højere administrativ myndighed.

§ 8. Den enkelte elev tilbydes uddannelses- og erhvervsvejledning efter regler fastsat af landsstyret.

§ 9. Handicappede elever får særlig undervisning eller specialpædagogisk hjælp efter regler fastsat af Skúlafyrisitingin.
Stk. 2. For elever, der på grund af sygdom ikke kan følge den sædvanlige undervisning gennem længere tid, iværksættes der sygeundervisningstiltag efter regler, fastsat af landsstyret.

Kapitel 5
Optagelse

§ 10. Ansøgere kan optages på et toårigt HF-kursus til højere forberedelseseksamen, hvis
1) ansøgeren er fyldt 18 år før 1. august i det år, han påbegynder undervisningen og
2) ansøgeren har afsluttet 10. klasse i folkeskolen og afsluttet folkeskolens udvidede afgangsprøve i færøsk og dansk, og folkeskolens afgangsprøve i fagene matematik og engelsk.
Stk. 2. Ansøgere, der ikke opfylder optagelsesbetingelserne efter stk. 1, nr. 2, kan dog optages efter rektors/kursuslederens vurdering af ansøgerens personlige og faglige egenskaber.

§ 11. Ansøger kan optages til studieforberedende enkeltfagsundervisning i henhold til reglerne i § 10, stk. 1 og 2.

§ 12. Optagelse til undervisning, der i et fag fører til højeste gymnasiale niveau i

í lærugreinini sambært § 4, fer fram eftir meting rektarans/skeiðleiðarans av førleika umsøkjarans í hvørjum einstøkum føri.

Kapittul 6
Skeiðsbygnaður

§ 13. Undirvísingin fer fram á studentaskúlum og HF-skeiðum landsins. Hesir stovnar kunnu skipa fyri undirvísing eftir hesi lóg á øðrum stovnum undir leiðslu og ábyrgd rektarans/skeiðleiðarans.
Stk. 2. Skeið og skúlar kunnu samstarva um undirvísingartól, høli, fyrisiting, leiðslu, lærarar og valbólkar.

§ 14. Landsstýrið tryggjar skeiðsrúmd til 2-ára HF-skeiðsundirvísing, soleiðis at allir umsøkjarar, ið lúka upptøkutreytirnar sambært § 10, verða tiknir upp.
Stk. 2. Landsstýrið kann áseta reglur um samskipan av undirvísingartilboðum innan stakgreinalestur í ávísum lærugreinum, ið eru neyðugar fyri upptøku til hægri framhaldslestur, umframt at áleggja verandi HF-skeiðum at skipa undirvísing í tílíkum lærugreinum.

Kapittul 7
Leiðsla

§ 15. Landsstýrið setur í starv og loysir úr starvi rektara/skeiðleiðara.

§ 16. Rektarin/skeiðleiðarin er leiðari skeiðsins og hevur ábyrgdina av virksemi skeiðsins mótvegis landsstýrinum.
Stk. 2. Rektarin/skeiðleiðarin hevur námsfrøðiligu ábyrgdina av undirvísingini og prógvtøkuni á skeiðinum mótvegis Skúlafyrisitingini.

faget i henhold til § 4, sker i hvert enkelt tilfælde på grundlag af rektors/kursusleders vurdering af ansøgerens kvalifikationer.

Kapitel 6
Kursusstruktur

§ 13. Undervisningen foregår ved landets gymnasier og HF-kurser. Disse institutioner kan organisere undervisning ifølge denne lov ved andre institutioner under rektors/kursusledere ns ledelse og ansvar.
Stk. 2. Kurser og skoler kan samarbejde om undervisningsudstyr, lokaler, administration, ledelse, lærere og valghold.

§ 14. Landsstyret sikrer kursuskapacitet til de toårige HF-kurser, således at alle ansøgere, der opfylder optagelsesbetingelserne i § 10, kan optages.
Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om koordinering af undervisningstilbud indenfor enkeltfagsundervisningen i visse fag, der er nødvendige for optagelse til højere videregående studier, og desuden pålægge nuværende HF-kurser at organisere undervisningen i sådanne fag.

Kapitel 7
Ledelse

§ 15. Landsstyret ansætter og afskediger rektor/kursusleder.

§ 16. Rektor/kursusleder er kursets leder og har ansvaret for kursets virksomhed overfor landsstyret.
Stk. 2. Rektor/kursusleder har det pædagogiske ansvar for kursets undervisning og eksaminer på kurset overfor Skúlafyrisitingin.

Stk. 3. Skúlafyrisitingin kann geva rektaranum/skeiðleiðaranum boð í námsfrøðiligum málum.
Stk. 4. Rektarin/skeiðleiðarin leiðir og býtir arbeiðið millum lærarar og starvsfólk á skeiðinum og tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingum, herímillum upptøku av næmingum.
Stk. 5. Rektarin/skeiðleiðarin heldur prøvtøku og skrivar prógvini.

§ 17. Á hvørjum HF-skeiði verður skipað lærararáð, lærarafundur og samstarvsnevnd eftir reglum, ið Skúlafyrisitingin ásetur.
Stk. 2. Um studentaskúli og HF-skeið eru undir somu lon, verður skipað eitt felags lærararáð.

§ 18. Á hvørjum HF-skeiði verður skipað næmingaráð, sum næmingarnir velja sínámillum eftir reglum, ið Skúlafyrisitingin ásetur.
Stk. 2. Næmingaráðið gevur ummæli til rektaran/skeiðleiðaran, herundir í almennum málum viðvíkjandi næmingaviðurskiftum.
Stk. 3. Næmingaráðið á hvørjum HF-skeiði ásetur sjálvt sína starvsskipan.
Stk. 4. Um studentaskúli og HF-skeið eru undir somu lon, verður skipað eitt felags næmingaráð.

§ 19. Landsstýrið hevur hægstu ábyrgd av undirvísing og prøvtøku á HF-skeiðunum, og Skúlafyrisitingin hevur eftirlitið.
Stk. 2. Skúlafyrisitingin kann sambært stk. 1 krevja allar upplýsingar viðvíkjandi skeiðunum, heruppí eisini stíla fyri vitjan á skeiðunum.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin ásetur reglur fyri innsavning av upplýsingum frá skeiðunum.

Stk. 3. Skúlafyrisitingin kan give rektor /kursusleder pålæg i pædagogiske spørgsmål.
Stk. 4. Rektor/kursusleder leder og fordeler arbejdet mellem lærere og personalet på kurset og tager alle konkrete afgørelser vedrørende eleverne, herunder optagelse af elever.
Stk. 5. Rektor/kursusleder afholder eksamen og udsteder eksamensbevis.

§ 17. Ved hvert HF-kursus organiseres der et lærerråd, lærermøde og samarbejdsudvalg efter regler, fastsat af Skúlafyrisitingin.
Stk. 2. Hvis gymnasium og HF-kursus huses sammen, nedsættes der et fælles lærerråd.

§ 18. På hvert HF-kursus organiseres et elevråd, som bliver valgt blandt eleverne efter regler, fastsat af Skúlafyrisitingin.
Stk. 2. Elevrådet afgiver udtalelse til rektor/kursusleder, herunder i generelle sager angående elevforhold.
Stk. 3. Elevrådet på hvert HF-kursus fastsætter selv sin forretningsorden.
Stk. 4. Hvis gymnasium og HF-kursus huses sammen, nedsættes der et fælles elevråd.

§ 19. Landsstyret har det overordnede ansvar for undervisning og eksamen på HF-kurserne, medens Skúlafyrisitingin har tilsynet.
Stk. 2. Skúlafyrisitingin kan i henhold til stk. 1 kræve alle oplysninger vedrørende kurset, herunder arrangere besøg på kurset.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin fastsætter regler for indsamling af oplysninger fra kurserne.

Kapittul 8
Lærarar

§ 20. Landsskúlaráðið setir í starv og loysir úr starvi lærarar. Setan og uppsøgn fer fram eftir tilmæli frá rektaranum-/skeiðleiðaranum.

Stk. 2. Setan sum adjunktur, lektari ella rektari/skeiðleiðari á HF-skeiði er treytað av, at viðkomandi í lærugreinarøðini, nevnd í § 2, stk. 1, hevur lokið kandidatprógv ella magistarakonferens á einum universiteti ella universitetssentri. Landsstýrið ásetur reglur um fakligan førleika fyri setan. Landsstýrið kann góðkenna, at umsøkjari, ið hevur lokið javnbjóðis prógv á øðrum hægri lærustovni, verður settur í omanfyri nevndu størv.

Stk. 3. Setan í fast starv sum lærari ella rektari/skeiðleiðari á HF-skeiði er treytað av, at viðkomandi hevur staðið prøvtøku í ástøðiligari og verkligari námsfrøði, umframt tikið lut í fakligum- námsfrøðiligum skeiði, sum skúlafyrisitingin skipar fyri.

Stk. 4. Skúlafyrisitingin gevur lærarum undirvísingarførleika í einari ella fleiri lærugreinum sambært reglunum í stk. 1 og 2.

Stk. 5. Landsstýrið ásetur reglur um ástøðiligt og verkligt námsfrøðiligt skeið, eins og reglur um atgongd til at taka samlað námsfrøðiligt skeið.

Stk. 6. HF-skeiðini hava skyldu eftir ávísing frá Skúlafyrisitingini at taka lærarakandidatar, ið skulu taka verkligt námsfrøðiligt skeið.

Kapittul 9
Fígging

§ 21. Landsstýrið rekur HF-skeiðini.

Stk. 2. Studningur kann verða veittur til royndar- og menningarvirksemi, eftirútbúgving, útbúgving av lestrarvegleiðarum og faklig skeið.

Kapitel 8
Lærere

§ 20. Lærere ansættes og afskediges af Landsskúlaráðið. Ansættelse og afskedigelse sker efter indstilling fra rektor/kursuslederen.

Stk. 2. Ansættelse som adjunkt, lektor eller rektor ved HF-kurset er betinget af, at vedkommende indenfor fagrækken, nævnt i § 2, stk. 1, har bestået kandidateksamen eller magisterkonferens ved et universitet eller et universitetscenter. Landsstyret fastsætter regler om faglige kvalifikationer for ansættelse. Landsstyret kan godkende, at ansøgere, der har afsluttet tilsvarende eksamen fra anden højere læreanstalt, kan ansættes i ovennævnte stillinger.

Stk. 3. Ansættelse i fast stilling som lærer eller rektor/kursusleder ved HF-kursus er betinget af, at vedkommende har bestået prøve i teoretisk og praktisk pædagogikum, samt deltaget i fagligt pædagogisk kursus, som Skúlafyrisitingin foreslår.

Stk. 4. Skúlafyrisitingin tildeler lærere undervisningskompetence i et eller flere fag i henhold til reglerne i stk. 1 og stk. 2.

Stk. 5. Landsstyret fastsætter regler om teoretisk og praktisk pædagogikum, samt regler om adgang til at tage et samlet pædagogikum.

Stk. 6. HF-kursene har pligt til efter anvisning fra Skúlafyrisitingin at modtage lærerkandidater, der skal tage praktisk pædagogikum.

Kapitel 9
Financiering

§ 21. Landsstyret driver HF-kurserne.

Stk. 2. Støtte kan ydes til forsøgs- og udviklingsarbejde, efteruddannelse, uddannelse af studievejledere og faglige kurser.

§ 22. Fulltíðarundirvísingin á HF-skeiðunum er ókeypis fyri næmingarnar.
Stk. 2. Næmingarnir skulu sjálvir útvega sær bøkur og annað undirvísingartilfar.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin kann heimila skeiðunum at taka gjald fyri ljóstøk til nýtsln í undirvísingini.
Stk. 4. Skúlafyrisitingin kann ásæta reglur um, at næmingar á lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing fyri tilkomin skulu lata eitt gjald fyri hvørja lærugrein sær og um gjaldsupphædd og gjaldsskipan.
Stk. 5. Landsstýrið ásetur reglur um, at næmingar, ið ynskja at innstilla seg til prøvtøku, uttan at teir eru innskrivaðir til undirvísing (sjálvlesandi), skulu lata eitt gjald.
Stk. 6. Inngjaldingin eftir stk. 4 og 5 er ein treyt fyri at fáa undirvísing og fara til prøvtøku.

Kapittul 10
Ymiskar ásetingar

§ 23. Landsstýrið kann í serligum førum ásæta reglur um frávik frá ásetingini í hesi lóg, fyri at fremja royndar- og menningarvirksemi. Royndar- og menningarvirksemi má ikki minka um næminganna møguleikar at nýta teirra útbúgving sum støði undir hægri framhaldslestri ella rættindi teirra í øðrum førum.
Stk. 2. Landsstýrið kann ásæta reglur um frávik frá ásetingunum í hesi lóg, um eitt skeið bjóðar fram undirvísing, ið miðar ímóti einum samsvarandi altjóðaprógvi, ið gevur atgongd til hægri framhaldslestur á jøvnum føti við HF-prøvtøku.

§ 24. Kæra yvir avgerð rektarans/skeiðleiðarans í námsfrøðiligum málum og málum, sum viðvíkja næmingum sambært § 16, stk. 4, kann innan 5 dagar eftir, at

§ 22. Fuldtidsundervisningen på HF-kurserne er vederlagsfri for eleverne.
Stk. 2. Eleverne skal selv anskaffe sig bøger og andet undervisningsmateriale.
Stk. 3. Skúlafyrisitingin kan give skolerne hjemmel til at tage betaling for fotokopier, der benyttes i undervisningen.
Stk. 4. Skúlafyrisitingin kan fastsætte regler om, at elever til studieforberedende enkeltfagsundervisning for voksne skal betale et gebyr for hvert enkelt fag, samt kursusafgift og betalingsordning.
Stk. 5. Landsstyret fastsætter regler om, at elever, der ønsker at indstille sig til eksamen, uden at de er indskrevet til undervisning (selvstuderende), skal betale et gebyr.
Stk. 6. Indbetalingen iflg. stk. 4 og stk. 5 er en betingelse for at få undervisning og gå til eksamen.

Kapitel 10
Forskellige bestemmelser

§ 23. Landsstyret kan i særlige tilfælde fastsætte regler om undtagelser fra bestemmelserne i denne lov, for at fremme forsøgs- og udviklingsarbejdet. Forsøgs- og udviklingsarbejdet må ikke forringe elevernes muligheder for at benytte deres uddannelse som grundlag for videregående studier eller deres rettigheder i anden henseende.
Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om at fravige bestemmelserne i denne lov, hvis et kursus tilbyder undervisning, der sigter mod en tilsvarende international eksamen, der giver adgang til fortsatte videregående studier på lige fod med HF-eksamen.

§ 24. Klage over rektors/kursusleders afgørelse i pædagogiske spørgsmål og sager, der vedrører elever i henhold til § 16, stk. 4, kan inden 5 dage efter, at

avgerðin er kunngjørd næminginum, leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum, ið landsstýrið ásetur. Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

afgørelsen er bekendtgjort for eleven, indbringes for Skúlafyrisitingin efter regler, fastsat af landsstyret. Skúlafyrisitingin's afgørelse kan ikke indbringes for højere administrativ myndighed.

Kapittul 11
Gildi o.a.

§ 25. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Lógin er fyrstu ferð at nýta fyri teir næmingar, sum byrja HF-útbúgving aftaná 1. august 1995.
Stk. 2. Samstundis fer løgtingslóg nr. 22 frá 23. apríl 1976 um hægri fyrireikingarprøvtøku úr gildi, tó soleiðis, at reglurnar framvegis eru galdandi til endan av skúlaárinum 1995/96 fyri næmingar, sum eru byrjaðir HF-útbúgving áðrenn 1. august 1995.

Kapitel 11
Ikrafttræden m.v.

§ 25. Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort. Loven omfatter elever, der påbegynder HF-uddannelse efter 1. august 1995.
Stk. 2. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 22 af 23. april 1976 om højere forberedelseseksamen, dog således, at reglerne fortsat er gældende til slutningen af skoleåret 1995/96 for elever, der har påbegyndt HF-uddannelse før 1. august 1995.

Viðmerkingar:

Málið um skeið til hægri fyrireikingarprøvtøku v.m. varð lagt fram av landsstýrinum 18. apríl 1995 og eftir 1. viðgerð beint í mentannar- og skúlanevndina. Málið var til 2. viðgerð tann 29. mai, men fall við 14-0 atkvøðum.

Mentannar- og Skúlanevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum og vent sær til skúlarnar, ið veita frálæru í HF-fyrireiking. Upplýst er nevndini, at tað er av alstórum týdningi, at lógin verður samtykt, áðrenn tingsetan endar.

Nevndin hevur gjørt tvær broytingar í mun til uppskot landsstýrisins. Aldursmarkið er broytt til, at næmingar skulu vera fyltir 18 ár áðrenn 1. august í tí ári, teir byrja frálæruna.

Hin broytingin er, at § 13 verður strikað. Annars er uppskotið frá landsstýrinum óbroytt.

Til tess at uppskotið kann samtykkjast, verður neyðugt við kvalifiseraðum meiriluta, t.e. 21 atkvøður, sambært tingskipanini, § 12, stk. 3.

Sama grundarlag, sum varð nýtt í sambandi við gerð av uppskoti til nýggja studentaskúlalóg, varð nýtt í sambandi við gerð av uppskoti til nýggja HF-lóg.

Í arbeiðssetninginum var tilskilað, at HF-útbúgvingin skuldu vera fyri tilkomin fólk, tí talan er um eina tvey ára útbúgving, sum krevur, at næmingarnir eru meira búnir. Eisini varð hildið, at útbúgvingartilboðið til tey, sum koma beinleiðis úr fólkaskúlanum, er nóg stórt, nú vit hava fingið útbygt handilsskúlarnar (FHS + HH) og teknisku skúlarnar (SIT + HT).

Tá nýggja danska HF-lóggávan varð sett í gildi í 1991, varð táttað í viðvíkjandi upptøku av næmingum beinleiðis úr 10. flokki. Krav varð sett um, at næmingarnir skuldu hava víðkaði fráfaringarroynd fólkaskúlans í donskum - og í tveimum av lærugreinunum: enskum, týskum ella fronskum. Umfram hetta skuldi fráfaringarskúlin vátta, at næmingurin var skikkaður.

Arbeiðsbólkurin viðgjørdi donsku HF-skipanina gjølla, og gjørdi síðani av, at av tí at talan var um tilkomið fólk í Føroyum (hetta merkir 18½ ár tá tey byrja í 1. HF), kundi týskt avtakast sum upptøkutreyt, umfram at vit bert krevja víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans í føroyskum og donskum, og fráfaringarroynd fólkaskúlans í støddfrøði og enskum. Við hesum er latið upp fyri, at tey, sum av ymiskum orsøkum ikki hava valt týskt í framhaldsdeildini, kortini kunnu fara undir HF-útbúgving, uttan fyrst at taka týskt á 9. floks støði.

Av tí at HF-útbúgvingin bert tekur 2 ár, gevur hon ikki sama støði í vallærugreinunum, sum ein 3 ára útbúgving. Møguleiki er tó fyri næmingar, sum vilja tað, at taka lærugreinir á hástigi, studentaskúlastigi, um so er, at hetta er neyðugt fyri at sleppa inn á hægri lærustovn.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

ad § 1: Greinin tilskilar, at talan er um bæði eina almennandi og eina lestrarfyrireikandi undirvísing fyri tilkomin, herundir stakgreinalestur.

§ 2: Tilskilað verður í greinini, hvørjar lærugreinirnar eru, sum tilsamans mynda eina HF-útbúgving.

ad § 3: HF-útbúgvingin fevnir um felagslærugreinir og eitt ávíst tal av vallærugreinum. HF-útbúgvingin kann setast ymiskt saman viðvíkjandi vallærugreinum, og tað eru teir hægru upptøkustovnarnir, sum ásetta krøvini um ávísar vallærugreinir og á hvørjum stigi hesar skulu vera, fyri at umsøkjarin kann verða tikin upp. Í kunngerð verður nærri ásett, hvussu býtið verður millum felagslærugreinir og vallærugreinir, og hvussu krøvini eru fyri at standa eina samlaða HF-prøvtøku. Møguleiki verður fyri at ávísar lærugreinir úr øðrum gymnasialum útbúgvingum kunnu verða partur av einari HF-prøvtøku.

ad § 4: Um ein HF-næmingur verður noyddur at taka ávísar lærugreinir á hástigi (A-stigi) sambært studentaskúlalúggávuni fyri at verða tikin upp til hægri framhaldsútbúgving, er møguleiki fyri at stíla fyri tí sum ein partur av HF-prøvtøkuni.

ad § 5: Greinin tilskilar, at tað ber til at taka eina samlaða HF-prøvtøku sum stakgreinalesandi. Tað merkir, at tey, sum av einari ella aðrari orsøk ikki hava møguleika fyri at fylgja einum fullum skeiði, so tíðandi kunnu taka tær prøvtøkur, sum tey hava brúk fyri. Tað ber eisini til at taka lærugreinir á studentaskúlastigi, um næmingurin hevur tørv á tí, við atliti at framhaldandi útbúgving.

ad § 6: Í hesi grein verður tilskilað, at landsstýrið ger nærri reglur um innihaldið av undirvísingini í lærugreinunum og á hvørjum stigi lærugreinirnar eru. Møguleiki er eisini fyri at fara til prøvtøku í einstøkum HF-lærugreinum sum sjálvlesandi.

ad § 7: Henda greinin ásetur øll viðurskifti viðvíkjandi prøvtøku. Í hesum sambandi skal prøvtøkukunngerð gerast, sum tilskilar, hvussu mannagongdin er viðvíkjandi øllum viðurskiftum, herundir eisini kæru um prøvtøku. Kæra um avgerðir tiknar í sambandi við prøvtøku, herundir um ásetan av prøvtali, kann innan 2 dagar, aftaná at avgerðin er kunngjørd næminginum, leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum, ið landsstýrið ásetur. Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

ad § 8: Eins og í øðrum útbúgvingum skulu næmingarnir hava útbúgvingar- og yrkisvegleiðing, soleiðis at teir verða betur førir fyri kvalifiserað at velja millum ymsar útbúgvingar- og vinnumøguleikar.

ad § 9: Næmingum við brekki skulu bjóðast serliga undirvísing ella sernámsfrøðiliga hjálp, soleiðis at eisini teir fáa útbúgving og betri vinnumøguleikar seinni. Er talan um, at næmingur gerst sjúkur í einum samanhangandi tíðarskeiði, skal møguleiki vera fyri at bjóða viðkomandi eina ávísa hjálp, so hann verður førur fyri at fylgja undirvísingini, tá ið hann gerst frískur.

Ad § 10: Skotið verður upp, at treytin fyri at verða tikin upp á HF-skeið, er, at umsøkjarin her fyltur 18 ár áðrenn 1. august í tí ári, hann byrjar undirvísingina, og at umsøkjarin hevur gingið 10 ár í skúla og lokið víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans í føroyskum og donskum og fráfaringarroynd fólkaskúlans í lærugreinunum støddfrøði og enskum. Møguleiki er fyri at gera undantøk frá regluni í stk. 1, nr. 2, um rektarin/skeiðleiðarin metir, at viðkomandi er førur fyri at fylgja undirvísingini og taka HF-prógv eftir vanligari tíð.

ad § 11: Stakgreinalesandi skulu í teimum einstøku lærugreinunum lúka tey sonu krøvini sum fullskeiðsnæmingar.

ad § 12: Greiniliga verður her ásett, at rektarin/skeiðsleiðarin tekur støðu til, um ein HF-næmingur er førur fyri fakliga at taka eina lærugrein á gymnasialum hástigi (A-stigi).

ad § 13: Møguleiki er fyri, at studentaskúlar og HF-skeið kunnu stíla fyri t.d. stakgreinaundirvísing aðrastaðni enn á studentaskúla/HF-skeiði, um tørvur er fyri tí.

Samstarv við t.d. aðrar skúlar um ymisk viðurskifti í sambandi við undirvísing er ein møguleiki.

ad § 14: Skotið verður upp, at umsøkjarar, sum lúka krøvini um upptøku, skulu takast upp, og at landsstýrið tryggjar skeiðrúmd. Um eitt skeið ikki hevur undirvísing í einari lærugrein, ið krevst fyri at sleppa inn á hægri framhaldslestur, kann einum skeiði verða álagt at skipa fyri undirvísing í hesi lærugrein. Landsstýrið skal áseta nærri reglur um hetta.

ad § 15: Tilskilað verður, at landsstýrið er tann myndugleiki, ið setur í starv og loysir úr starvi rektara/skeiðleiðara.

ad § 16: Tilskilað verður, at rektarin/skeiðleiðarin hevur høvuðsábyrgdina av HF-skeiðinum. Tað er neyðugt greitt at tilskila, at tað bert er rektarin/skeiðleiðarin, ið hevur rætt og skyldu at útinna ávísar funktiónir á skeiðinum. Millum annað í sambandi við, at farið verður yvir til mál- og rammustýring, er tað umráðandi, at ábyrgdin verður greitt tilskilað.

ad §§ 17 og 18: Eitt HF-skeið er ein heild, og tí mugu allar funktiónir, herundir lærararáð og næmingaráð, ið hoyra heima á HF-skeiðinum, tilskilast í lógini. Ásett er, at um HF-skeið og studentaskúli eru undir somu lon, verður bert eitt felags lærararáð og eitt felags næmingaráð skipað.

ad § 19: Tá ið løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting varð gjørd, varð serliga hugsað um fólkaskúlan. HF-skeið eru eins og studentaskúlar øðrvísi og hava ein annan bygnað og eitt annað innihald enn fólkaskúlar. Higartil hevur meginparturin av lógargargrundarlagnum verið danskt. Skotið verður upp at gera føroyskt lógargrundarlag, ið tekur hædd fyri viðurskiftunum á HF-skeiðunum. Greinin ásetur, at landsstýrið hevur hægstu ábyrgdina av undirvísingini og prøvtøkuni á HF-skeiðnum.

ad § 20: Í hesi grein eru øll viðurskifti viðvíkjandi lærarum við studentaskúlar tilskilað, herundir førleikakrøv - bæði fakliga og námsfrøðiliga.

ad § 21: Ásett er, at tað er landsstýrið, sum rekur HF-skeiðini.

ad § 22: Skotið verður upp, at undirvísingin verður ókeypis fyri næmingarnar, samstundis sum lógarheimild verður fyri, at næmingarnir á HF-skeiðunum sjálvir skulu útvega sær bøkur og annað undirvísingartilfar. Higartil hevur tað ikki verið tilskilað nakrastaðni, men praksis hevur verið so. Skotið verður upp, at heimild verður fyri at taka gjald fyri ljóstøk, sum nýtt verða í undirvísingini.

ad § 23: Tað skal vera møguligt at gera frávik frá reglunum í hesi lóg, men eitt frávik má á ongan hátt minka um møguleikarnar hjá næmingunum at halda fram í hægri framhaldslestri.

ad § 24: Skotið verður upp, at avgerðir rektarans í námsfrøðiligum málum og málum, sum viðvíkja næmingum sambært § 16, stk. 4, innan 5 dagar eftir at avgerðin er kunngjørd næminginum, kunnu leggjast fyri Skúlafyrisitingina sambært reglum, ið landsstýrið ásetir. Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingar ligan myndugleika.

ad § 25: Skotið verður upp, at lógin verður at nýta fyrstu ferð fyri teir næmingar, sum byrja HF-útbúgving aftaná 1. august 1995. Í stk. 2 eru gjørdar skiftisreglur fyri næmingar, sum byrjaðu HF-útbúgving áðrenn 1. august 1995.

1. viðgerð 31. mai 1995. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið samtykt við 30-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. juni 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

Lóg nr. 107 frá 29. juni 1995.

100-1 Viðvíkjandi ætlan landsstýrisins um ES-kanningar

Ár 1994, mánadagin 19. september boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Edmund Joensen, løgmann frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Kann løgmaður greiða tinginum fyri, hvat liggur í orðinglni í samgonguskjalinum:

"Møguleikarnir fyri gagnligastu marknaðaratgongd við ES verða kannaðir...."

Viðmerkingar:

Øllum kunnugt hevur handilsavtalan við ES ikki roynst føroyingum nóg væl, og hevur tí frá politiskari síðu - ein væl frá vinnuligari - støðugt verið borið uppá mál og dentur lagdur á, at betra um fyrimunir føroyinga í slíkum samskifti.

Uppleggið úr Føroyum var at fáa ein frihandilssáttmála við felagsskapin, soleiðis, at eingin tollur varð lagdur á vøruhandilin partanna millum.

Hetta vildi felagsskapurin ikki góðtaka, tí teir mettu summar fiskavørur at vera so viðkvæmar fyri teirra marknaði, at teir ikki kundu loyva avmarkaðum tollfrúm innflutningi.

Longu undir málsviðgerðini í tinginum vísti andstøðan á hesar vansar og tók m.a. tí ikki undir við sáttmálanum.

Undir samráðingum við danir um lántøku og endurfígging av skuld landskassans sæst, at viðurskifti Føroya við ES hava verið umrødd og fingið við í "protokolat", at danir vildu virka fyri, at føroyingar komu at fáa meira burturúr.

Hvussu henda roynd dana hevur eydnast nýtast ikki nógvar reglur at lýsa.

Nú hevur so samgongan sett sær fyri, at "kanna møguleikarnar fyri gagnligastu marknaðaratgongd við ES.."

Hvat ES-limaskapi viðvíkur, so eiga orð Richard Vorks, samráðingarleiðara hjá ES at havast í huga, har hesin vísandi til handilssáttmálan m.a. segði seg vóna at hava givið eitt politiskt signal um, at Føroyar vóru vælkomnar uppí ES og at ES vónaði, at

Føroyar fóru at gerast limir.

Ikki bert frá ES síðu er áhugi at fáa Føroyar uppí ES. Heitastu talsmenn í Føroyum fyri ES-limaskapi hava nú landsins leiðslu um hendi.

Tí er tað náttúrligt hjá andstøðuni - og føroyska fólkinum - at fáa greiði á, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur, nú samgongan hevur sett sær fyri at kanna "gagnligastu marknaðaratgongd við ES".

Partur av samgonguni hevur sagt alment, at her er ikki talan um at kanna møguleikarnar fyri ES-limaskapi. Løgmaður harafturímóti hevur ferð eftir ferð alment sagt, at "gagnligasta marknaðaratgongd" er eisini at skilja sum kanning av møguligum ES-limaskapi.

Í parlamentariskum høpi vigar tað sum kemur frá einum samgonguleiðara tyngri enn tað, sum kemur frá einstakum samgongulimi. Tí, tá løgmaður úttalar seg, so ger hann tað ikki vegna sín politiska flokk, men vegna landsstýrið - vegna tann politiska meirilutan.

Men tá ein samgonguavtala sum her - eftir øllum at dømi er vorðin ein tulkingar spurningur, er tað av týdningi, at greið signal verða givin tinginum og tí føroyska fólkinum.

Loksins skal undirstrikast, at hevur landsstýrið ætlanir at nærkast ES-limaskapi, so fer Miðflokkurin av øllum alvi at stríðast ímóti slíkum ætlanum.

Við 22-0 atkvøðum varð 21. oktober 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

22. desember 1994 svaraði løgmaður soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Kann løgmaður greiða tinginum frá, hvat liggur í orðingini í samgonguskjalinum:

"Møguleikarnir fyri gagnligastu marknaðaratgongd við ES verða kannaðir ..."

Svar:

Háttvirdi tinglimurin Tordur J. Niclasen spyr, hvat liggur í orðingini í samgonguskjalinum millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin, Verkamannafylkingina og Sjálvstýrisflokkin: "Møguleikarnir fyri gagnligastu marknaðaratgongd við ES verða kannaðir."

Samgongan eins og andstøðan hava ásannað tann ovurstóra týdning marknaðaratgongd hevur fyri eina tjóð, sum í stóran mun framleiðir til útflutnings. Vísandi til at 75% av

høvuðsframleiðslu Føroya fer til núverandi og komandi ES-lond, ásannar samgongan, at marknaðaratgongd okkara til ES nú og í framtíðini hevur avgerandi týðning fyri at varðveita og menna vinnulívið í Føroyum.

Vinnulívsfólk okkara og ikki so fáar serfrøðinganevndir mannaðar við vinnulívsfólki og føroyskum og útlendskum embætisfólki hava ferð eftir ferð lagt áherðslu á, at marknaðaratgongd okkara til ES mátti broytast samsvarandi hesum, og hava allir tí samstundis sagt, at núverandi handilssáttmáli í skapi og innihaldi forðar fyri skjótari og varandi menning av høvuðsvinnu okkara og samfelagnum.

Samgonguskjalið nevnir við ymsum orðingum í ymsum sambondum betri marknaðaratgongd fleiri ferðir, og er hetta tekin um, hvussu umráðandi verandi samgonga - og helst í góðari semju við andstøðuna - metir hetta mál.

Meðan allir tingmenn og politiskir flokkar umboðaðir á tingi eru samdir um, at verandi sáttmáli veitir Føroyum og Føroya vinnulívi ov trongar karmar at virka í, og at teir mugu víðkast og betrast, so er ikki tilsvarandi semja um, hvussu hesir karmar skulu broytast, við hvørjum innihaldi og við hvørjum tiltøkum.

Landsstýrið hevur gjørt av at skipa okkara marknaðar- og handilsavtaluøki við fólki í umsitingini, sum burturav tekur sær av hesum saman við serfrøðingum innan og uttan fyri føroysku umsitingina, sum er í holt við at fyrireika lýsing av okkara møguleikum at fáa "gagnligastu marknaðaratgongd við ES". At gera slíka lýsing krevur eina gjøgnumgongd av øllum hugsandi møguleikum.

Landsstýrið fer tí í næstum at skipa slíkt kanningararbeiði á einum so breiðum og effektivum grundarlagi sum møguligt til tess at kunna leggja hetta fram.

Annars havi eg gjørt avtalu við Marknaðarnevnd Løgtingsins um regluligar fundir um uttanlandsspurningar. Fyrsti fundur hevur longu verið um okkara handilsavtalu við ES.

Viðvíkjandi stuðli frá donsku stjórnini, sum Tordur J. Niclasen tykist halda lítið um, er at siga, at hon má metast upp ímóti, hvat vit bigartil sjálvi hava viljað nýtt av kreftum í hesum arbeiði.

Eg havi nýliga á fundum við Poul Nyrup Rasmussen, forsætismálaráðharra, og Niels Helveg Petersen, uttanríkismálaráðharra, avtalað, at teir seta neyðuga orku umsitingarliga í mun til tørvin.

Nevnda orðing í samgonguskjalinum sigur sostatt, at samgongan fer at meta um gagnligastu marknaðaratgongdina millum allar hugsandi kannaðar møguleikar.

T.v.s. at vit við atliti at teim broytingum, sum henda í næstum á okkara størsta marknaði og í okkara brøðratjóðum, kanna allar møguleikar, og síðani taka støðu til innihaldið og formin í framtíðar samvinnu okkara við ES.

100-2 Viðvíkjandi Heilsuverki Føroya

Ár 1994, týsdagin 18. oktober boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Andrias Petersen, landsstýrismann frá Jenisi av Rana, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Hvørjar ætlanir hevur Føroya Landsstýri viðvíkjandi samskipan av virkseminum á føroysku sjúkrahúsunum, ætlaðu samanleggjanini innan primeru heilsurøktina, & útbyggjan/nýbyggjan á Landssjúkrahúsinum?

Viðmerkingar:

Landssjúkrahúsið er centralsjúkrahús okkara, har serdeildir og serlæknar eru tøkir, tá á stendur. Júst á serlæknaøkinum eru seinru árini stórar broytingar farnar fram, fleiri serútbúnir læknar eru settir í starv, og nútíðar tøknifrøðilig tól eru komin til landið, her kunnu nevnast scopi (kikara) tól, tól til hjartakanningar. CT scannari v.m.

Øllum kunnugt eru ný- og útbyggingar gjørdar á smærru sjúkrahúsum okkara seinru árini, men ætlaða útbyggingin av centralsjúkrahúsinum er drálað. Ein bæti, um enn óneyðuga lítil vegna tørvandi samskipan, varð, tá ambulatoriið fyri fáum árum síðani varð bygt.

Skilamenn á Landssjúkrahúsinum hava seinru árini biðið um og rátt til ikki at brúka meira pening upp á lappaloysnir, sum skúrar og barakkir jú eru, men heldur brúka peningin til at byrja ætlaða høvuðsbyggjarríið í smáum. Slíkt eru skilaráð og vilja avgjørt vísa seg í síðsta enda at verða ikki bert øllum føroyingum, frá Fugloy til Sumblar, sum nýta gott av centralsjúkrahúsvirksemi Landssjúkrahússins, at gagni, men samfelagnum sum heild, ikki minst fíggjarliga.

Ørkymlandi ætlanir um skúrútbygging av centralsjúkrahúsinum hava seinastu tíðina skapað óneyðugan ótryggleika og ótta. Í kjalarvørrinum av hesum kemur náttúrliga spurningurin um vit á gagnligasta hátt gera nýtslu av teimum "facilitetum" vit longu hava.

Við atliti til fíggjarstøðu landsins, álitið millum sjúklingar og trivnaðin á hesum stóru arbeiðsplássunum, átti hægsti politiski myndugleikin loksins at skorið igjøgnum og fram heildarætlan, sum nøktar tørvin, og gevur frið á hesum viðkvæma øki komandi mongu árini.

Drál er komið í samanleggingina av heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini & heimahjálparskipanini, ein sjálvsøgd samanlegging, sum er samtykt av politisku

myndugleikunum, og tí átti at verið framd beinanvegin.

Við 25-0 atkvøðum varð 21. oktober 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

22. desember 1994 svaraði Andrias Petersen soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Hvørjar ætlanir hevur Føroya Landsstýri viðvíkjandi samskipan av virkseminum á føroysku sjúkrahúsunum, ætlaðu samanleggingini innan primeru heilsurøktina og útbygging/nýbygging á Landssjúkrahúsinum.

Svar:

Sambært galdandi sjúkrahúslóggávu ynskir landsstýrið best møguligu samskipan innan sjúkrahúsverkið til gagns fyri sjúklingarnar og at fáa sum mest burtur úr tí peningi, sum er tøkur til endamálið.

Viðvíkjandi primeru heilsurøktini er á seinastu fíggjarlóg og aftur á hesi fíggjarlóg heima- og heilsusjúkrasystraskipanin løgd saman við heimahjálpini til eitt rakstrarstað: Heimarøktin, og er ætlanin í komandi ári at leggja tann fyrisitingarliga partin av hesum skipanum saman, so hetta verður ein skipan við einari leiðslu.

Viðvíkjandi nýbygging á Landssjúkrahúsinum er einki avsett til hetta á komandi fíggjarlóg vegna væntandi tøkan pening til hetta. Men um strukturrationaliseringarnar verða framdar, sum fíggjarlógin leggur upp til, eru møguleikar fyri hølisøking á Landssjúkrahúsinum uttan stórvegis meirkostnað.

100-3 Viðvíkjandi flakavirkinum í Vági

Ár 1994, týsdagin 18. oktober boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Ivan Johannesen, landsstýrismann frá Jákupi Olsen, løgtingsmani, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið fyri flakavirkinum suðuri í Vági og onnur flakavirki, sum Føroya Fiskavirking partvíst ella heilt hevur ella fer at steðga.

Viðmerkingar:

Sunnari partur av Suðuroynni er allur hart raktur av tí, at einki arbeiði longur er á flakavirkinum í Vági.

Hetta flakavirkið var fyri ikki so nógvum árum síðan hitt mest nýmótans flakavirki, ikki bara í Føroyum, men í øllum Norðurevropu.

Tí er tað at undrast á, at Føroya Fiskavirking hevur steðgað øllum vanligum fiskiarbeiði á flakavirkinum í Vági.

Fleiri skip eru í Vági og útróðrarbátar eisini, sum nú bert kunnu avreiða fiskin í Vági. Hesin fiskur verður so fluttur av bygdini til virkingar aðrastaðni.

Arbeiðsloysið er stórt í sunnari helvt av Suðuroynni, og fólk flyta burtur í hópatali, so at Vágur nú er minkaður niður um 1500 fólk og tí ikki longur er nakar býur.

Landsstýrið kann ikki bara lata standa til, men má hava eina ætlan um, hvussu arbeiði aftur fæst, har virki standa tóm og fólk flyta av landinum.

Tí verður hesin spurningur settur landsstýrismanninum í fiskivinnuídnaði.

Við 25-0 atkvøðum varð 21. oktober 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

5. desember 1994 svaraði Ivan Johannesen, landsstýrismaður soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið fyri flakavirkinum suðuri í Vági og onnur flakavirki, sum Føroya Fiskavirking partvíst ella heilt hevur ella fer at steðga?

Svar:
Eg má svara háttvirda tingliminum Jákupi Olsen aftur, at landsstýrið ikki hevur ætlanir fyri einstøk flakavirki, sum privat partafeløg eiga. Flakavirkið í Vági varð í samband við umfatandi skuldarsaneringina av flakavirkjum várið 1993 selt Føroya Fiskavirking. Landsstýrið fer ikki at leggja seg út í, hvussu privat virki leggja rakstur sín til rættis, eftir teimum ætlanum og møguleikum tey hava til tilfeingi og fíggjarliga.

Hinvegin arbeiðir landsstýrið ógvuliga nógv við spurninginum um, hvussu vinnulívið í Føroyum aftur fæst á føtur. Hetta verður gjørt í fleiri stigum. At nevna eru uppskot um at samskipa tilboðini til vinnuna um stuðul úr landskassanum og øktar møguleikar fyri fígging aftrat tí fígging, sum fæst frá peningastovnunum, serliga í tí nýggja vinnulívsgrunninum, sum varð avtalaður við donsku stjórnina 17. november.

Hetta eru royndir at skapa karmar fyri vinnulívinum, sum fáa vent tí gongd niðureftir, sum hevur verið síðan 1992.

Landsstýrið fer ikki aftur inn í stuðul, so sum hann varð veittur í áttatiárunum. Royndirnar av hesum eru okkum dýrar í dag. Innan teir karmar, sum nú verða skaptir, er tað uppgávan hjá vinnuni sjálvari við áræði, dugnaskapi og vilja at seta nakað í váða at gera ætlanir og fáa tær at virka. Her man Suðuroyggin ikki vera verri fyri enn onnur, hvørki tá tað kemur til fólk ella vinnufeløg. Eg kann tó nevna av serligum áhuga fyri Vágs bygd, at landsstýrið ætlar áhaldandi at stuðla royndunum at fáa kongafisk úr Irmingarhavinum til virkingar í Føroyum.

Sum sagt, landsstýrið kann ikki skapa virksemi, tað má vinnulívið, men hetta landsstýrið fer av øllum alvi at arbeiða fyri, at karmarnir fyri einum vinnulívi á sunnum og haldgóðum støði verða so góðir sum møguligt.

100-4 Ábyrgdin av umsitingini í almannamálum

Ikki fráboðaður.

100-5 Viðvíkjandi viðgerðartíðini av kærum í almannamálum

Ár 1994, fríggjadagin 21. oktober boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Andrias Petersen, landsstýrismann frá Kristiani Magnussen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Fyrispurningurin til landsstýrismannin er soljóðandi:

> **Hvat heldur landssstýrið vera rímiliga viðgerðartíð av eini kæru, áðrenn avgerð verður tikin í málinum?**
>
> **Hvussu long er viðgerðartíðin í dag?**
>
> **Um so er, at landsstýrið metir, at viðgerðartíðin er ov long, hvat ætlar landsstýrið so at gera fyri at stytta hesa?**

Viðmerkingar:

Áðrenn 1. apríl 1994 viðgjørdi Føroya landsstýri kærur í almannamálum. Hvørki borgarar ella politikarar vóru nøgdir við støðuna, tí mett varð, at rættartrygdin hjá borgarum landsins ikki var nøktað, tá sami myndugleiki, ið smíðar lógir, eisini er kærustovnur um avgerðir, ið verða tiknar eftir somu lógum. Eisini varð ásannað politiskt, at viðgerðartíðin kundi gerast alt ov drúgv, upp í fleiri ár, áðrenn svar fyrilá.

Tá kærunevndin í almannamálum fór at virka 1. apríl 1993, vónaðu nógv, at nú fóru kærur at fáa skjótari og betri viðgerð.

Undirritaði hevur varhugan av og veit um ávísar kærur, sum nú 1½ ár aftan á, at kærunevndin fór til verka, enn taka alt ov langa tíð at viðgera, áðrenn avgerð fyriliggur. Undirritaði vil minna á, at nógvar av kærunum snúgva seg um umsóknir hjá fólki um fíggjarligan stuðul til lívsneyðug endamá so sum mat á borðið, húsaleigu, heilivág og líknandi, sum svar ikki kann bíðast ov leingi eftir.

Við 21-0 atkvøðum varð 21. oktober 1994 varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

21. desember 1994 svaraði Andrias Petersen, landsstýrismaður soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Hvat heldur landsstýrið vera rímiliga viðgerðartíð av eini kæru, áðrenn avgerð verður tikin í málinum?

Hvussu long er viðgerðartíðin í dag?

Um so er, at landsstýrið metir, at viðgerðartíðin er ov long, hvat ætlar landsstýrið so at gera fyri at stytta hesa?

Svar:

1. apríl 1993 varð sett á stovn Kærunevnd í Almannamálum sambært løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993. 16. juli 1993 varð sett starvsfólk á skrivstovuna hjá kærunevndini at taka sær av dagligu viðgerðini. Kærunevndin hevði sín fyrsta regluliga fund tann 25. august 1993, men longu 17. november 1993 var síðsti regluligi fundur av tí, at ósemja kom um samsýningina fyri nevndararbeiðið.

Tann 21. februar segði táverandi formaður í kærunevndini seg frá. Starvsfólkið á kærunevndini segði seg eisini úr starvi tann 1. apríl 1994. Nýggjur formaður í kærunevndini varð valdur í mai 1994 og nýggjur skrivari settur á skrivstovuni hálvan juni 1994.

Tann fyrsti regluligi fundurin, síðan nýggjur formaður og skrivari vórðu settir, var 5. juli 1994, og síðani hevur fundur verið aftur í september mánaði. Sambært upplýsingum frá kærunevndini pr. 24. november 1994 verður roknað við, at talið av ikki avgreiddum kærumálum, sum liggja hjá kærunevndini, er tilsamans 235. Av hesum eru uml. 160 kærur hjá Almannastovuni til umrøðu.

Kristian Magnussen spyr, um hvat landsstýrið heldur vera rímiliga viðgerðartíð av eini kæru, áðrenn avgerð verður tikin í málinum.

Til hetta er at siga, at í vanligum kærum metir landsstýrið rímiliga viðgerðartíð at vera millum 3 og 6 mánaðir í vanligum førum, men landsstýrið heldur eisini, at tað skal vera

møguleiki fyri hastandi viðgerðum, hetta serliga í samband við endurútbúgvingarmál, har undirvísingin sum oftast byrjar eina ferð um árið, og støða skal takast til, um viðkomandi kann byrja undirvísing ella ikki tað árið. Somuleiðis er tørvur á møguliga hastandi avgerðum í ávísum førum, tá tað snýr seg um peningaligar veitingar. Hastandi avgerðir metir landsstýrið vera frá fáum døgum til 2-3 vikur.

Landsstýrið ásannar, at síðani kæruncvndin varð sett á stovn, hevur hon ikki virkað nøktandi, hetta vegna tørvandi starvsfólk. Landsstýrið fer nú at fylgja ncyvt við, hvussu gongdin verður í kærumálum komandi ársfjórðing og miðar ímóti, at kærumálini verða avgreidd soleiðis, at bíðitíðin kemur á eitt rímiligt støði, sum omanfyri nevnt.

100-6 Sparingar og bygnaðarbroytingar í avtaluni frá 12. oktober 1993 á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum

Ár 1994, hósdagin 27. oktober boðaði formaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Edmund Joensen, løgmann frá Jákupi Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Hvørjar eru sparingarnar og bygnaðarbroytingarnar ("strukturrationaliseringer") á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum, sum landsstýrið við avtaluni frá 12. oktober 1993 hevur bundið seg til at fara undir, og hvussu ætlar landsstýrið sær at seta hesar í verk.

Viðmerkingar:

Í avtalunum, sum higartil síðan 6. oktober 1992 eru gjørdar við donsku stjórnina, er tað eitt orð, sum gongur aftur og tí tykist at hava stóran týdning. Tað er orðið "struktur" - "strukturrationaliseringar", sum sagt verður í teirri seinastu avtaluni frá 12. oktober 1993.

Sum úrslit av hesum avtalum hava vit tí síðan fingið samanlegg-ingar í stórum tali.

Samanlegging av fiskavirkjum á landi, saman- legging av bankunum, samanlegging av fiskiskapinum og eina kvotuskipan, sum mest minnir um tað, teir søgdu farvæl til í fyrrverandi kommunistisku londunum eystanfyri. Talað verður í álvara eisini um eina samanlegging av kommunum, og uppskot hava verið frammi um at leggja allar Føroyar saman í eitt valdømi.

Í teirri seinastu avtaluni við donsku stjórnina frá 12. oktober 1993 bindur landsstýrið og tepri samgongumeirilutin á løgtingi seg til at fara undir bygnaðarbroytingar ("strukturrationaliseringer") og sparingar á heilsu-, skúla-, almanna- og samskiftisøkinum frá fíggjarárinum 1995.

Fíggjarárið 1995 byrjar um 2 mánaðir.

Er ætlanin at spara á heilsuøkinum við at avtaka stýrini fyri tey 3 sjúkrahúsini og leggja tey saman í eitt, so at farið kann vera undir eina samanlegging av sjúkrahúsunum og kanska niðurlegging av teimum smáu sjúkrahúsunum á sama hátt, sum bankarnir vórðu samanlagdir og annar teirra niðurlagdur, flakavirkini samanløgd og nøkur teirra niðurløgd o.s.fr.

Tað sama kann verða sagt um skúlaøkið. Er bygnaðarbroytingin her, at bygdaskúlar skulu verða niðurlagdir, og undirvísingin savnast á teimum størru skúlunum. Hvør sparing er í tí? Hvussu ávirkar hetta bygdarlívið og samfelagið alt?

Hvat er hugsað um við bygnaðarbroytingum á almannaøkinum? Er hugsað um at draga alt, sum gevur nakað av sær, inn á miðøkið, men samtíðis flyta teir socialu trupulleikarnar út á bygdirnar, so at hitt almenna sleppur undan nøkrum av teimum útreiðslunum, ið standast av neyðini hjá fólki.

Samskiftisøkið verður eisini nevnt í avtaluni við donsku stjórnina. Hvat er tað, ið har skal leggjast saman og sparast burtur. Er tað farleiðin hjá suðringum, sum síðsta landsstýrið ætlaði at leggja um Sandoynna. Ella farleiðin um Leirvíkarfjørð fyri norðingar, sum longu er nógv niðurskorin, ella sambandið um Vestmannasund, sum eisini er skert. Fólk undrast, hvat ið ætlanin er, og summi ilskast. Samgonguskjalið hjá borgarligu landsstýrissamgonguni, sum undirskrivað var, hevði í hyggju at spara gjøgnum privatiseringar m.a. á samskiftisøkinum. Hetta hevði veitt eina bæði betri og bíligari tænastu. Men hvussu vil hetta landsstýrið spara? Við at minka um tænastuna og túratalið? Ella hvussu?

Ongum er ókunnugt, hvørjir sorgarleikir, ið longu nú hava staðist av ógvusligu bygnaðarbroytingunum í samfelagi okkara, bæði fyri heim, familjur, bygdir og einstaklingar.

Stórt arbeiðsloysi og øgilig fólkaflyting er úrslitið av, at flakavirkini vórðu løgd saman, kvotuskipanini og broytingunum í fiskivinnuni, bankasamanleggingunum v.m.

Tí er neyðugt at ávara móti fleiri stórum broytingum sama vegin.

Heldur eiga vit at fara undir at bøta um teir skaðarnar, kravdu broytingarnar longu nú hava elvt til, og t.d. opna flakavirkini aftur, har einki arbeiði er.

Málið fall við 15-0 atkvøðum.

100-7 Viðvíkjandi avmonteringini av føroysku høvuðsvinnuni

Ár 1994, týsdagin 8. november boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Ivan Johannesen, landsstýrismann frá Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

1) Styðjar landsstýrið áhaldandi avmonteringini av høvuðsvinnu okkara?

2) Um ikki, hvat ætlar landsstýrið at gera, so at leiðslu- og ábyrgdarmenningin, sum seinastu hálvu øldina hevur spírað og ment seg í føroyskum vinnulívi, kann fóta sær og aftur leggja lunnar undir fritt vinnuvirksemi?

Viðmerkingar:

Síðan 6. okt. 1992, tá danska stjórnin tók valdið í Føroyum gjøgnum Fíggingargrunnin, sum fyrst setti seg á Sjóvinnubankan og seinni á Føroya Banka, hevur tað verið ein miðvís gongd, at flestir føroyskir ábyrgdarpersónar í leiðslustøðvum í vinnuni eru skúgvaðir til viks, og danir eru komnir í teirra stað.

Og dømini tróta ikki.
Í Fíggingargrunninum er nevndarmeirlutin og formaður danir. At nevndin á sinni varð samansett soleiðis, var móti landsstýrisins vilja. Í "stórsinni" loyvdi danska stjórnini tveimum føroyingum at gerast nevndarlimir, tó bert sum observatørar.
Fíggingargrunnurin kann mest av øllum metast at vera ein skuggastjórn, men við størri heimildum enn Føroya Løgting. Hóast missnøgdin ikki hevur skortað manna millum og

politiskt um avgerðir grunsins, hevur onki verið at hoyrt til tær føroysku nevndarrøddirnar.

Bæði í nevndini og stjórnini í almenna monopolbankanum Føroya Banka, eiga danir avgerðandi orðið, hóast føroyingar, til uggilsi, fingu nevndarformannin og ein stjórnarlim.

Móti vilja føroyinga, varð Føroya Fiskavirking kroyst yvir okkum, og varð eisini har settur ein dani sum nevndarformaður. Ein maður, sum er uttan minsta kunnleika um fiskivinnu ella føroysk viðurskifti sum heild.

Saman við formanninum í Fíggingargrunninum situr hann við buktini og báðum endunum, tá avgerðir skulu takast um framtíðina í landi okkara.

Eisini Føroya Fiskasøla, sum var føroysk burturav og sum var ímyndin av stabiliteti, og eisini var grundarsteinurin undir føroyskari útflutningsvinnu, er í dag fyri somu lagnu, sum restin av høvuðsvinnu okkara.

Kjarnin í føroyskum vinnulívi legði støðið undir hesa fyritøku, og hevur hon verið høgt í metum millum viðskiftafólk føroyinga uttanlands.

Tað er tí stórt spell, at ein av hornasteinunum í hesum samtaki, fígging av framleiðsluni, nú er flutt av landinum í eitt danskt felag við danskari leiðslu.
Nevndarformaðurin í Fiskasøluni er nú sum vera man eisini dani. Loksins er nú lýst eftir sølu- og marketingsstjóra í nýggja upphýtinum av Faroe Seafood koncernini. Nýggi stjórin skal sjálvsagt hava bústað í Hirtshals, har fíggjarstjórin frammanundan heldur til. Sostatt skuln tveir av teimum trimum stjórunum í leiðsluni búgva í Danmark, har nevndarformaðurin eisini býr.

Samanumtikið bendir tí alt á, at ein tilætlað avmontering av føroyska vinnulívinum er leisturin, sum er støðið undir gongdini í dag.

Sokallaðar serfrøðinganevndir hava allar stórt sæð styðjað nýggju fordeilingsskipanina, har aðaltátturin hevur verið at skapa nýggja fyritreytir bygdar á monopol og sokallaði profittsentur.

At stigtakararnir til gongdina í landinum burturav eru sannførdir um moralska meirvirðið í sínum atgerðum mótvegis føroyskum vinnulívi er ótald dømi um. Besta dømið er svarið, sum fíggjarmálaráðharrin í Javnaðar-/Fólkaflokslandsstýrinum fekk frá danska stjóranum í táverandi Føroya Banka á fundi um monopoliseringini av flakavinnuni, har landsstýrismaðurin m.a. førdi fram, at monopolætlanirnar fóru at fremja "hjerneflugt" hiðani. Svarið var stutt "...her er ingen hjernekapasitet at flygte!?"

Júkað hevur verið upp í saman, at førdi politikkurin er neyðug atgerð, skal landið fóta sær aftur, og at fremmandu persónarnir, sum settir eru í leiðandi størvini, bert eru ein sjálvsagdur partur av hesi process. Men neyvan gera hesir arbeiðið av idealistiskum

orsøkum.

Harafturímóti tykist aðaltátturin í rikna tíggjarpolitikkinum vera at tryggja útlendsku kreditorarnar mest møguligt. Í hvussu so er, er tað sera torført at fáa eyga á sambandið millum vinnu- og tíggjarligu avgerðirnar tiknar verða, og so málsetningin at endurreisa landið búskaparliga.

Tí er eisini ilt at síggja, hvussu hesin veruleiki í høvuðsvinnuni kann samantvinnast við ætlanir landsstýrisins at fáa fólk aftur í arbeiði.

Í nýggju kollektivistisku skipani hevur einstaklingurin als einki rásarúm at leggja lunnar undir møguligt privat vinnuvirksemi. Tí standa øll sum frálíður í andstøðu til skipanina, og samfelagið rotnar innanífrá.

Hesin poltikkur, sum tók støðið undan høvuðsvinnuni, lemjir nú allar vinnumøguleikar heilt út í ytsta liðið í tænastuvinnuni.

Sostatt rekur skipanin øll virkisfúsin fólk av landinum. Í samsvar við ræðandi veruleikan er hesin álvarsspurningur settur landstýrismanninum at svara.

Við 20-0 atkvøðum varð 10. november 1994 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

5. desember 1994 svaraði Ivan Johannesen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1) Styðjar landsstýrið áhaldandi avmonteringini av høvuðsvinnu okkara?
2) Um ikki, hvat ætlar landsstýrið at gera, so at leiðslu- og ábyrgdarmenningin, sum seinastu hálvu øldina hevur spírað og ment seg í føroyskum vinnulívi, kann fóta sær og aftur leggja lunnar undir frítt virksemi?

Svar:
Tá eg las fyrispurningin frá háttvirda tingliminum Bjarna Djurholm, kom tað mær fyri, at her varð viðgjørdur ein sera týdningarmikil spurningur, men at framløgan um hann var sera langrøkjut og illa undirbygd. Eg skilji tó, at ørindini hjá Bjarna Djurholm eru serliga at havast at tí, at ymsir persónar, sum búgva í Danmark, sita í týðandi nevndum í Føroyum. Eg eri samdur við honum í, at síðani 6. oktober 1992, tá Fólkaflokkurin í táverandi samgongu avreiddi meginpartin av tí sjálvstýri, sum heimastýrislógin frá 1948 gevur føroyingum, er tað hent, at fleiri persónar búsitandi í Danmark hava fingið leiðandi størv í Føroyum. Hetta er fyri okkum føroyingar ein alt annað enn heppin gongd. Hann finst eisini at teimum loysnum, sum eru komnar burtur úr tí neyðugu saneringini av stórum pørtum av føroyska vinnulívinum.

Eg kann siga fyri meg sjálvan, at eg ikki havi verið fegin um nógv av tí, sum er farið fram. Hin vegin eri eg til reiðar at viðganga, at lítið skil var í nógvum av tí, sum gekk

fyri seg árini undan skrædlinum í 1992. Tað var væl saktans tað, sum tók støðið undan høvuðsvinnu okkara og førdi til tær heldur herknu tvingsilsloysnir, sum vit mugu liva við í dag, og sum vit mugu viðganga eru mest ásettar av okkara kreditorum. Vit mugu eisini viðganga, at tað er og hevur verið rætt at royna at gjalda skyldur sínar og at trúvirði føroyinga og møguleikar fyri at skapa fígging í komandi tíðum, kundu verið mistir eitt langt tíðarskeið fram, um kreditorarnir ikki fingu sømdir.

Vit hava ógvuliga lítið rásarúm eina tíð, men tó somikið at hetta landsstýrið heldur tað bera til at venda gongdini. Framgongdin má tó byggjast á eitt haldgott og sunt grundarlag og ikki sum í áttatiárunum, har at kalla allar búskaparligar lógir vórðu settar úr gildi.

Viðvíkjandi tiltøkum landsstýrisins hesum viðvíkjandi kann eg vísa til svar til Jákup Olsen, løgtingsmann, í løgtingsmáli nr. 100-3/94.

Tá tað er sagt, so má eg leggja aftrat, at eg haldi, at prógvførslan hjá háttvirda løgtingsmanninum hongur ikki saman. Í fíggingargrunninum er danskur meirihuti og tykist hetta vera rótin til alt ilt. So sigur hann, at danir eiga avgerandi orðið í Føroya Banka. Hetta kann ikki - út frá sama hugsunarhátti - vera ein fylgja av býtinum av nevndarlimum. Har sita tveir danir og 5 føroyingar og formaðurin er føroyingur. Umskipanin av Føroya Fiskasølu til partafelag var avgerð hjá felaguum sjálvum og góðkend á aðalfundi hjá lutafelagnum. Og annað er eisini. Eg haldi, at tingmaður, sum leggur slíkt álvarsmál fram, hevur skyldu at vanda sær um grundgevingarnar og ikki bert byggja á vanligt túnatos.

100-8 Viðvíkjandi analfabetismu í Føroyum

Ár 1994, mánadagin 5. desember boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Eilif Samuelsen, landsstýrismann frá Óla Breckmann, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

1. Er tað rætt, sum Landsskúlafyrisitingin førir fram alment, at fjórði hvør føroyingur dugir ikki at lesa til húsbrúks?

2. Er talið á fólki, sum ikki dugir at skriva føroyskt, tilsvarandi stórt ella kanska enntá størri?

3. Um so er, hvussu stórur partur av játtanini á løgtingsins fíggjarlóg til skúlaverkið, sum í ár er 355 mió. kr. (umframt uml. 150 mió. kr. á kommunalu fíggjarætlanunum), verður brúktur til at læra føroyskan skúlaungdóm at lesa?

4. Um 1/4 av Føroya fólki ikki lærir at lesa í skúlanum, hvussu meta skúlamyndugleikarnir, at hesir næmingar kunnu læra onnur fakøki, tá bert kunnu nemast við lesing?

5. Hvussu ber til, at henda skelkandi niðurstøða skúlamyndugleikanna ikki kemur fram fyrr enn nú, eftir at føroyski (og danski) skattgjaldarin hevur goldið ialt 8.000.000.000 (8 miljardir) krónur fyri skúla og útbúgving farnu 20 árini?

6. Um Føroya Skúli ikki klárað at læra næmingar at lesa tey "góðu" árini við bólgnandi peningajáttanum til útbúgving og gransking" (sum rakstrarstaðið eitur á fíggjarløgtingslógini), hvussu ætlar Landsskúlafyrisitingin og landsstyrið, at løgtingið skal fíggja lesiundirvísing av teim 10.000 føroyingunum, sum ikki duga at lesa, nú tá almenni peningurin ikki røkkur til verandi játtan?

7. Hvussu ætlar landsstýrið at effektivisera frálæruna í lesikynstri á øllum frálærustigum, soleiðis at tær uml. 50.000 kr., sum hvørt av teimum 10.000 ungfólkunum kosta árliga, sum í løtuni og til eina og hvørja tíð ganga í skúla?

8. Ella kann gølumiðstøðin hjá Landsskúlaafyrisitingini umfatandi analfabetismuna vera ein royn hjá skúlalærarum at finna sær onkra vinnuterapi av sama slag sum tilboð um frálæru fyri arbeiðsleys, 11. flokkar, útfylling av lesiætlanum fyri sáttmálaløn o.a., mest tí 100 tals foreldur flýggja av landinum við børnum í skúlaaldri undan tí lemjandi skattatrýsti, sum verður brúkt til at halda m.a. einum skúlaverki uppi, sum ikki virkar so frægt, at børnini læra at lesa?

Við atkvøðugreiðslu 19. desember 1994 fall málið við 11-0 atkvøðum.

100-9 Viðvíkjandi felags kvotuni hjá útróðrarbátum yvir 20 BRT

Ár 1995, mánadagin 16. januar boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurntngi til Ivan Johannesen, landsstýrismann frá Jákupi Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Heldur landsstýrið tað vera rætt, at aðrir trolbátar enn teir 13 á landleiðini, hvørs partur er frábýttur í lógini, frítt fiska tosk og hýsu burtur av felags kvotuni hjá útróðrarbátunum yvir 20 BRT, og at snelluskipini yvir 110 BRT gera tað sama.

Hvussu vil landsstýrið tryggja, at nóg mikið verður eftir av kvotuni til útróðrarbátarnar millum 20 og 110 BRT, ið royna við línu og snellu.

Viðmerkingar:

Útróðrarbátar yvir 20 BRT eru í lógini bólkaðir fyri seg, bólkur 4, og fiska teir av felags árskvotu.

Burtur av hesi kvotu fáa teir 13 trolbátarnar, sum um summarið hava loyvi til at royna innan fyri 12 fjórðingar, frábýtt 70 tons av toski og 30 tons av hýsu í part.

Harafturat fiska í løtuni 2 trolbátar, sum ikki hava trolloyvi innan fyri 12 fjórðingar, burtur av felags kvotuni hjá útróðrarbátunum yvir 20 br. reg. tons.

Hesir trolbátar kunnu saman við snellu- og línuskipunum fiska, sum teir vilja av toski og hýsu, til felags kvotan hjá útróðrarbátum yvir 20 tons er uppi.

Eisini snelluskip yvir 110 BRT fiska burturav hesi somu felags kvotuni hjá útróðrarbátunum yvir 20 BRT.

Tá ið teir 13 trolbátarnir á landleiðini hava fingið sín part frábýttan, er eftir at fiska hjá øllum hinum í bólkinum av toski 1295 tons á landgrunninum og 360 tons á Føroya Banka. Av hýsu er tað 1290 tons.

Um miðjan december høvdu bátarnir fiskað 11% av toskinum, 6% av hýsuni og 18% av upsanum, sum bendir á, at tað mest hevur verið roynt við snellu.

Útróðrarmenn stúra fyri, at tey stóru snelluskipini og trolbátarnir koma at fiska so nógv av felags kvotuni, at hon verður uppi, áðrenn várfiskiskapurin er av, og at teir

útróðrarbátarnir, sum einki Íslandsloyvi hava, tá onga staðir hava at fara.

Við 26-0 atkvøðum varð 19. januar 1995 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

10. mars 1995 svaraði Ivan Johannesen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Heldur landsstýrið tað vera rætt, at aðrir trolbátar enn teir 13 á landleiðini, hvørs partur er frábýttur í lógini, frítt fiska tosk og hýsu burtur av felags kvotuni hjá útróðrarbátunum yvir 20 BRT, og at snelluskipini yvir 110 BRT gera tað sama.

Hvussu vil landsstýrið tryggja, at nóg mikið verður eftir av kvotuni til útróðrarbátarnar millum 20 og 110 BRT, ið royna við línu og snellu.

Svar:
Tær reglur, sum eru fyri allar bólkar av fiskiførum, sum fiska á landleiðunum undir Føroyum, eru ásettar í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap. Landsstýrið hevur ongar heimildir uttan tær í hesi lóg at seta reglur fyri fiskiskapi, og løgtingið hevur í lógini álagt landsstýrinum júst tað býtið, sum spyrjarin umrøður.

Í upprunaliga uppskotinum, sum landsstýrið legði fyri løgtingið í desember 1993, varð skipanin heilt øðrvísi. Her var ásett, at hvør útróðrarbátur yvir 20 BRT fekk sína egnu kvotu av høvuðsfiskasløgunum. Hvør bátur hevði sostatt sítt egna at ráða yvir og kundi leggja sær fiskiskapin til rættis eftir tí. Løgtingið broytti hetta uppskot til tað, sum landsstýrið fyrisitur eftir nú.

Spyrjarin vísir her á eitt fyribrigdi, sum eftir landsstýrisins tykki ikki hevur funnið eina hepna loysn. Í næstum fer landsstýrið at leggja fyri tingið uppskot til ávísar broytingar í lóg um vinnuligan fiskiskap. Í hesum sambandi fer landsstýrið eisini at taka spurningarnar, sum her eru reistir, til viðgerðar.

100-10 Viðvíkjandi uppsøgnum av fólki í Akrabergi

Ár 1995, mánadagin 16. januar boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann frá Jákupi Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Hvørjar eru ætlanirnar við Vitaverkinum í Føroyum, nú so nógvir mans eru uppsagdir, verður tænastan verri og hvat vil landsstýrið gera við tað?

Viðmerkingar:

Fastlønt og tímalønt fólk hava verið knýtt at vitanum á Akrabergi alt síðani hesin var reistur og er tað tí løgið, at fólk nú eru søgd upp, so bert ein maður skal vera knýttur til vitan.

Vitin í Akrabergi hevur gjørt tænastu bæði í friðartíð og krígstíð og mong merki standa í vitanum, sum bera boð um skotriðini frá flúgvarum, sum gjørdu álop á vitan.

Flogfør, ið dagliga flúgva yvir Føroyum hava samband við vitan og útlendsk og ikki minst okkara egnu skip hava dagliga samband við vitan.

Akraberg er sunnasti endi landsins og Røstin er eitt av ringastu sjóøkjum at fara um. Har sigla okkara sjómenn dag og nátt, tí Munkagrunnurin er eitt av ríkastu fiskimiðum okkara.

Útsýnið úr Akrabergi er gott, og um ikki so gott vaktarhald hevði verið har, kundi mong ein ólukka verið hend. Sjómenn hava dagliga samband við Akraberg, og er hetta ein tryggleiki hjá hesum mannum.

Í Íslandi er ein skipan, har øll fiskifør eisini opnir bátar skulu boða frá, tá ið farið verður frá landi.

Hendan skipan átti eisini at verið sett í gildi í Føroyum, og tá hevði tað eins og í Íslandi verið neyðugt við einari vaktarskipan í Akrabergi, so bátar og skip kundu boðað teimum frá, nær teir fóru frá landi og hvar teir vóru staddir á sjónum.

Útróðrarmenn og onnur við stúra, nú hópuppsagnirnar í Akrabergi eru settar í verk, at henda skipan í seinasta lagi kann koma at kosta mannalív. Mangan hevur Akraberg boðað frá uppstoppaðum bátum og fiskiførum, ið eru við at reka á land ella reka í Røstina. Nú vandi er fyri at hesin tryggleiki verður tikin frá okkara sjómonnum, eigur Føroya landsstýri at gera vart við hetta hjá avvarandi myndugleikum og í allarringasta

føri sjálvt fara undir at finna eina loysn, eins og gjørt varð við føroysku veðurtænastuna fyri nøkrum árum síðani.

Við atkvøðugreiðslu 19. januar 1995 fall málið við 15-0 atkvøðum.

100-11 Viðvíkjandi Rás Tórshavn

Ár 1995, fríggjadagin 27. januar boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann frá Finnboga Ísakson, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

1) Eru sendingarnar hjá Rás Tórshavn undir teirri í Føroyum galdandi lóggávu, eisini hvat rúsdrekkalýsingum viðvíkir?

2) Ætlar landsstýrið at leggja uppskot fyri tingið um at broyta lóggávuna soleiðis, at Sjónvarp Føroya og Rás Tórshavn verða javnsett lýsingum viðvíkjandi?

Viðmerkingar:

Hesi seinastu árini hevur tøknifrøðiliga gongdin verið soleiðis, at tað er møguligt hjá føroyingum eins og øðrum at síggja útlendskt sjónvarp gjøgnum fylgisveinar. Við neyðugari útgerð kunna fólk sostatt í dag síggja eitt ótal av sjónvarpssendingum, eins og tað í mong ár hevur verið gjørligt at hoyrt eitt ótal av útvarpsstøðum. Tað hevur ikki, ber neyvan til og eigur heldur ikki at verða gjørt nakað fyri at avmarka tað, sum fólk kunna síggja og hoyra, tá útgerðin til móttøku er teirra egna.

Føroyskir fjølmiðlar eru í einari serstøðu. Lóggávan forbjóðar td. bæði loftmiðlum og bløðum at hava lýsingar um rúsdrekka.

Spurningurin er, um Rás Tórshavn er í hesi sonu serstøðu. Her er talan um, at

Tórshavnar Býráð sendir sjónvarp. Tað er torført at síggja mun á, at Sjónvarp Føroya sendir td. danskar sendingar, sum eru bandaðar, og so Rás Tórshavn, sum sendir danskar og aðrar útlendskar sendingar beinleiðis.

Tí verður spurt, um tann lóggáva, sum er galdandi fyri sendingarnar hjá Sjónvarp Føroya, eisini fevnir um Rás Tórshavn.

Nú Rás Tórshavn fer at senda danskt TV3 kann hugsast, at hetta fer at nerva inntøkumøguleikarnar hjá Sjónvarpi Føroya, tí nógvar av teimum reklamum, sum Sjónvarpið sendir, verða hereftir at síggja á TV3.

Haraftrat er vert at nevna, at td. donsk bryggjarí kunna lýsa við sterkum í TV3, meðan tey føroysku bryggjarítni ikki hava møguleika at lýsa við sterkum í okkara egna sjónvarpi.

Tí verður eisini spurt, um ætlanin er at javnseta Sjónvarp Føroya og Rás Tórshavn lýsingum viðvíkjandi.

Við 23-0 atkvøðum varð 31. januar 1995 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

10. mars 1995 svaraði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1) Eru sendingarnar hjá Rás Tórshavn undir teirri í Føroyum galdandi lóggávu, eisini hvat rúsdrekkalýsingum viðvíkur?

2) Ætlar landsstýrið at leggja uppskot fyri tingið um at broyta lóggávuna soleiðis, at Sjónvarp Føroya og Rás Tórshavn verða javnsett lýsingum viðvíkjandi?

Svar:

Í samband við spurning 1 í løgtingsmálinum heitti landsstýrið á landfútan um at kanna viðurskiftini í galdandi lóggávu, eisini hvat rúsdrekkalýsingum viðvíkur.

Í svari til landsstýrið dagfest 9. februar 1995 sigur landfútin, at sambært § 19 í løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 eru lýsingar í føroyskum fjølmiðlum v.m. viðvíkjandi sølu, skeinking og útflýgging av rúsandi løgi bannaðar.

Einki verður sagt í fyrireikingararbeiðinum til lógina um, hvussu hugtakið føroyskir fjølmiðlar skal skiljast.

Tað kann eftir vanligari, natúrligari málsligari fatan neyvan vera ivi um, at TV 3 eigur at metast sum ein fjølmiðil. Spurningurin er so, um TV 3 ella aðrar fylgisveinastøðir,

ið senda frá støðum uttanfyri Føroyar og vera móttiknar um eina parabolantennu, hvørs signal verður sent út til ein breiðari hóp av fólki, kann metast sum ein føroyskur fjølmiðil.

Í avgerðini av hesum má gerast ein meting av øðrum útlendskum fjølmiðlum, sum verða sendir út í Føroyum og seldir um føroysk sølufólk. Eitt serliga gott dømi um hetta eru donsku dagbløðini, sum verða innflutt til Føroya. Sambært landfútanum er eingin ivi um, at hesi dagbløð ikki eru at meta sum føroyskir fjølmiðlar, sjálvt um hesi verða seld um føroysk sølufólk. Í hesum sambandi eigur dentur at verða lagdur á, at dagbløðini eru framleidd uttanfyri Føroyar og ikki serstakt ætlað føroyska almenninginum. Út frá hesi áskoðan metir landfútin, at tað eigur at verða víst aftur, at TV 3, óansæð um sent verður um eina parabolantennu til ein størri skara ella ikki, kann metast sum ein føroyskur fjølmiðil. Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at tað, ið sent verður við felags antennuskipan ella antennuskipan, sum tí hjá Tórshavnar kommunu av beinleiðis sendingum, ikki er regulerað í føroysku lóggávuni. Sum framhald í hesum sambandi upplýsir landfútin, at dousku ásetingarnar um sjónvarpsreklamur hava forboð móti reklamum, sum snúgva seg um sterkar rúsandi drykkir, men at hetta ikki hevur fört við sær, at TV 3 ikki kann senda slíkar reklamur, vegna tess at TV 3 sendir úr London.

At enda sigur fútin, at endaliga avgerðin av spurninginum er eitt mál, sum hoyrir til dómstólarnar.

Vísandi til frammanfyri nevnda svar landfútans metir landsstýrið sendingarnar hjá Rás Tórshavn ikki at vera í stríð við galdandi lóggávu, heldur ikki hvat rúsdrekkalýsingum viðvíkur.

Viðvíkjandi spurninginum um landsstýrið ætlar at leggja uppskot fyri tingið um at broyta lóggávuna soleiðis, at Sjónvarp Føroya og Rás Tórshavn verða javnsett lýsingum viðvíkjandi er at siga, at landsstýrið ongar ætlanir hevur um at broyta verandi lóggávu innan økið.

100-12 Viðvíkjandi kommunulæknaskipanini í Føroyum

Ár 1995, týsdagin 31. januar boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Andrias Petersen, landsstýrismann frá Eliesar Høj, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Hvat vil landsstýrið gera fyri at bøta um kommunulæknaskipanina í Føroyum t.d. í Norðoyggjum, har 2 av 3 kommunulæknum eru sjúkrameldaðir, og hin triði er ovbyrjaður og helst fer í orlov eina tíð?

Viðmerkingar:

Sum dømi kunnu vit vísa á kommunulæknaskipanina í Norðoyggjum sum smb. Sosialin nr. 18 frá 26. januar 1995 hart rakt.
2 av 3 kommunulæknum eru sjúkrameldaðir - tað kann henda hjá øllum, eisini læknum - og hin triði er so ovbyrjaður, at hann sjálvur heldur tað vera ein spurningur um dagar, ið hann kann halda fram einsamallur at røkja starvið fyri o.u. 6000 fólkum í Norðoyggjum. 100 avgreiðslur verða sagdar at hava verið um dagin, og tað er bara tíð til at taka sær av tí mest neyðturviliga læknaarbeiðinum. Neyvar kanningar ella aðrar viðgerðir er eingin tíð til.

Hetta hevur verið skilið í útvið 1 mánað, og tað kann ikki halda fram.

Torført er at fáa vikarar til kommunulæknastørvini, tí at eingir læknar eru tøkir.

Fyrr hava læknar á sjúkrahúsinum tikið vaktir fyri kommunulæknarnar, men á sjúkrahúsinum í Klaksvík eru nú so fáir læknar eftir, at tað har verður sagt, at tað ber ikki til longur.

Vetur er og góð krímsjúkutíð, so at stúrt verður fyri, hvat ið hendir, um umfarssjúka av álvara ger vart við seg.

Í Noreg eru 5 til 7 kommunulæknar, ið røkja øki á stødd við Norðoyggjar.

Landsstýrið hevur víst á tað neyðuga í tí, at øll kommunulæknaskipanin verður endurskoðað. Men støðan í Norðoyggjum kann ikki bíða, til ein nevnd einaferð kemur við einum tilmæli um loysn av allari kommunulæknaskipanini í Føroyum.

Tað hevur ljóðað, at tann triði kommunulæknin í Klaksvík umhugsar at fara í orlov. Tað er mark fyri, hvussu nógv ið ein maður kann halda til, og kommunulæknar hava

eisini fyri neyðini at fáa sær meira vitan og endurnýggja seg.

Við 17-0 atkvøðum varð 2. februar 1995 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

1. juni 1995 svaraði Andrias Petersen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Hvat vil landsstýrið gera fyri at bøta um kommunulæknaskipanina í Føroyum t.d. í Norðoyggjum, har 2 av 3 kommunulæknum eru sjúkramoldaðir, og hin triði er ovbyrjaður og helst fer í orlov eina tíð?

Svar:

Landsstýrið er væl vitandi um trupulleikarnar at fáa kommunulæknar at virka í Føroyum serliga í útjaðaraøkinum. Tí samtykti landsstýrið tann 24. januar 1995 at seta niður arbeiðsbólk við umboðum úr landsumsitingini, kommunulæknafelagnum, landslæknanum, Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Føroya Kommunufelag at greina út trupulleikarnar og koma við uppskotum um loysn. Væntandi kemur álitið frá hesum bólki í summar ella tíðliga í heyst og tá verður støða tikin til, hvussu viðari skal farast fram.

100-13 Viðvíkjandi seismisku kanningunum, sum verða gjørdar við Føroyar

Ár 1995, týsdagin 14. februar boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Edmund Joensen, løgmans frá John Petersen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

1. Hvørjar avmarkingar liggja á tí tilfari, ið kemur frá seismisku kanningunum, sum verða gjørdar við Føroyar?

2. Er hetta kanningartilfar bert atkomiligt hjá føroysku oljuumsitingini, ella fær Danmarks Geologiske Undersøgelse (DGU) automatiskt somu upplýsingar?

3. Um so er, at DGU fær somu upplýsingar, fer løgmaður so at steðga hesum, av tí at undirgrundin og ráevni eru yvirtikin sum føroyskt málsøki?

Viðmerkingar:

Ein orsøk til, at hesir spurningar verða settir, er støðan, ið Føroyar eru komnar í, eftir at stjórnin ikki vil ganga einum samdum tingi á møti um eina dómarakanning í sambandi við "bjarging", partabrævabýti og samanlegging av bankunum.

Onnur orsøk til henda fyrispurning er tey punkt í avtaluni millum landsstýrið og ríkisstjórnina, sum fevna um rávøru í undirgrundini.

Ein triðja orsøk er, at sonevnda "Færøgruppen" arbeiðir við at fáa sum mest burtur úr føroyska samfelagnum fyri at dugna stórfyritøkum í Danmark, eitt nú Den Danske Bank, sum farnu øldina hevur forvunnið 100-tals mio. kr. og nú slapp at heingja eina 1,5 mia. kr. rokning um hálsin á føroyska skattgjaldaranum -við vælsignilsi frá donsku stjórnini og fíggjareftirlitinum.

Hvat kunnu hesir ikki finna uppá, um teir koma at sita við somu ella betri upplýsingum, enn vit føroyingar í sambandi við allar kanningar av møguligum ráevnum í undirgrundini.

Tí er tað av alstórum týdningi, at vit beinanvegin fáa byrgt fyri hesum, so ikki sama søga endurtekur seg, og føroyingar aftur sita við svartaperi, meðan fremmand fáa ágóðan av hesum møguleika, tí einasta hjá komandi ættarliðum av føroyingum til at virka og búleikast her - uttan at verða tyngd til jarðar av eini botnleysari skuld.

Tí má berast so í bandi, at hetta ikki hendir, tí vit, sum av handahógvi lata allar upplýsingar um kanningar av undirgrundini av hondum, so skjótt og so hvørt teir koma fram.

Vit eiga ikki at geva øðrum innlit í føroysk loyndar- og áhugamál, eitt nú útvinning av møguligum ráevnum, sum teir helst eru betur førir fyri at útgreina skjótari enn vit, tí teir sita á størri kunnleika og hava størri arbeiðsorku enn vit og kunnu villleiða okkum á sama hátt, sum leiðslan í tíggingargrunninum hevur gjørt higartil móti landsstýrinum og føroyingum.

Givið er, at "Færøgruppen" lívgar donsk áhugamál og ikki føroyska samfelagið. Tað, sum ikki verður gjørt við lokabrøgdum, kann danska stjórnin gera við sínum heimildum í gjørdum avtalum, uttan mun til hvat føroyingar siga. Verandi støða er besta prógv um hetta.

Við 28-0 atkvøðum varð 17. februar 1995 samtykt, at Edmund Joensen, løgmaður skuldu svara fyrispurninginum.

27. aprìl 1995 svaraði Edmund Joensen, løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvørjar avmarkingar liggja í tí tilfari, ið kemur frá seismisku kanningunum, sum verða gjørdar við Føroyar?

2. Er hetta kanningartilfar bert atkomiligt hjá føroysku oljuumsitingini, ella fær Danmarks Geologiske Undersøgelse (DGU) automatiskt somu upplýsingar?

3. Um so er, at DGU fær somu upplýsingar, fer løgmaður so at steðga hesum, av tí at undirgrundin og ráevni eru yvirtikin sum føroyskt sermál?

Svar:

Til tann fyrsta spurningin er at siga, at tær seismisku kanningarnar, sum verða gjørdar í løtuni eru ogn hjá felagnum Western Geophysical Corporation, sum ger kanningarnar. Felagið selur tilfarið til oljufeløg, sum eru áhugað í økinum.

Oljufyrisitingin fær avrit av øllum kanningartilfari í tilknýti til seismisku upptøkurnar, og letur oljufyrisitingin Jarðfrøðisavninum tað til viðgerðar og varðveitslu.

Í loyvisskjalinum til seismikkfelagið hevur landsstýrið bundið seg til ikki at lata upplýsingar um upptøkurnar ella úrslitini til onnur tey fyrstu árini. Onkur undantøk eru tó, t.d. kunnu upplýsingar av meira almennum slag latast í sambandi við almennar lýsingar, ársfrágreiðingar v.m.

Upptøkutilfarið sum slíkt og tey neyvaru úrslitini annars kunnu ikki latast privatum persónum ella feløgum og kunnu bert latast øðrum myndugleikum, um hetta er liður í cinum samstarvi, og um so er, eru hesir myndugleikar bundnir at somu treytum sum

Oljufyrisitingin at halda tilfarið loyniligt.

2. Tá talan er um Danmarks Geologiske Undersøgelser, so hevur hesin stovnurin frá byrjan verið uppi í nærum øllum arbeiðum, sum snúgva seg um føroysku undirgrundina. Til dømis gjørdi DGU ta umfatandi jarðfrøðiligu kortleggingina á landi, sum endaði við útgávuni av tí jarðfrøðiliga føroyakortinum seinast í 1960'unum. Síðani hevur DGU gjørt eitt stórt jarðfrøðiligt kanningararbeiði í Føroyum, bæði á landi og á havbotninum um Føroyar. Ein hin størsta kanningarætlanin er sonevnda Føroyar-Rockall Prosjektið, sum hevur tilknýti til krav Føroya og Danmarkar uttan fyri 200 fjórðinga markið í ein útsynning úr Føroyum.

Síðani Jarðfrøðissavnið varð stovnað í 1953, hava DGU og Føroya Landsstýri, einamest ígjøgnum Jarðfrøðisavnið, havt eitt neyvt og gott samstarv, sum m.a. ber í sær, at alt kanningartilfar, sum DGU arbeiðir við innan føroyska jarðfrøði, verður latið Jarðfrøðisavninum í varðveitslu. Tey nógvu árini, ið Jóannes Rasmussen, sáli, arbeiddi á Jarðfrøðissavninum, var hann samstundis settur leiðari á DGU-Føroyadeild, og tá hann fór frá vegna aldur í 1980, varð ein nevnd sett at stýra hesum arbeiði. Í hesi nevnd sita tríggir føroyingar og tveir danir. Somuleiðis sita tríggir føroyingar í nevndini fyri Føroya-Rockall Prosjektið saman við trimum limum úr Danmark.

Tá so ráevnini í føroysku undirgrundini vórðu yvirtikin sum føroyskt málsøki burturav, varð ein nýggj samstarvsavtala gjørd millum Føroya Náttúrugripasavn (Jarðfrøðisavnið) og DGU. Hendan avtalan tekur hædd fyri teimum broyttu viðurskiftunum, og hon ber m.a. við sær, at DGU ikki automatiskt fær atgongd til kanningartilfarið viðvíkjandi oljuleitingum á føroyska økinum.

Fyri at kunna viðgera kanningarúrslitini á fult professionellan hátt hevur Jarðfrøðissavnið hin vegin tørv á hjálp uttanoftir, og onki er meira natúrligt, enn at henda hjálpin í stóran mun verður funnin, har hon best kann veitast, nevniliga á Danmarks Geologiske Undersøgelser. Í tí nýggju samstarvsavtaluni við DGU verður m.a. staðfest, at DGU skal hjálpa til at byggja upp tann kunnleikan, ið krevst á Jarðfrøðisavninum, fyri at vit so við og við kunnu gera tað mesta arbeiðið sjálvi.

Tá fyrstu tíðina hava vit sum nevnt stóran tørv á hjálp uttaneftir, og tí er DGU uppií tí jarðfrøðiliga oljuleitingararbeiðinum í Føroyum, m.a. tulkingini av tí seismiska tilfarinum, eftir reglum, sum vit sjálvi ásetta, og DGU hevur sjálvandi neyva tagnarskyldu viðvíkjandi tí tilfari, ið teir fáa kunnleika til hesum viðvíkjandi. Hendan tagnarskyldan umfatar m.a., at DGU ikki uttan loyvi úr Føroyum kann lata øðrum donskum myndugleikum tær upplýsingar, sum hava við oljuleitingar í Føroyum at gera.

Eg meti tað vera sera týdningarmikið at hava hesa avtalu við DGU, so vit við teirra hjálp kunnu byggja upp tann serkunnleikan á hesum øki, sum vit hava tørv á, og havi eg fult álit á, at av-markingarnar tryggja, at upplýsingar um føroysku undirgrundina ikki koma óviðkomandi í hendi.

100-14 Viðvíkjandi teknisku skúlunum

Ár 1995, týsdagin 14. februar boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Eilif Samuelsen, landsstýrismann frá Álvi Zachariasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

1. Hvør er orsøkin til, at Tekniski Skúlin í Klaksvík er avskorin frá at hava skúlagongd fyri handverkslærlingum, og hvørjar ætlanir eru, um lærlingatalið kring landið fer at økjast?

2. Hvør er orsøkin til, at fleiri framhaldsútbúgvingar nú verða bodnar út, og eru útlit fyri at fylla hesar karmarnar út á báðum skúlunum?

3. Havandi útgerð og høtisviðurskifti í huga, kunnu útbúgvingarnar gerast bílígari við einum greiðari býti ella samskipan millum skúlarnar?

4. At enda verður landsstýrismaðurin í skúlamálum biðin um at greiða frá teimum politisku ætlanunum fyri báðar teir teknisku skúlarnar.

Viðmerkingar:

Í 1993 avger tá sitandi landsstýri, at býtið av virkseminum á teknisku skúlunum skal vera soleiðis, at øll skúlagongdin hjá handverkslærlingum er í Tórshavn, meðan SIT er á báðum støðum. Í Tórshavn er hartil Maskinatstøðisútbúgving og í Klaksvík Maskin- og El-atstøðisútbúgving umframt gymnasiuútbúgvingin Hægri Tøkni (HT).

Í inniverandi fíggjarlóg er hetta virksemisbýtið broytt. Sonevnda Byggiatstøðisútbúgvingin er komin aftrat í Tórshavn og Klaksvík, og El-atstøðisúutbúgvingin er komin aftrat í Tórshavn.

Við 28-0 atkvøðum varð 17. februar samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

27. apríl 1995 svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1) Hvør er orsøkin til, at Tekniski Skúlin í Klaksvík er avskorin frá at hava skúlagongd fyri handverkslærlingum, og hvørjar ætlanir eru, um lærlingatalið kring landið fer at økjast?

2) Hvør er orsøkin til, at fleiri framhaldsútbúgvingar nú verða bodnar út, og eru útlit fyri at fylla hesar karmarnar út á báðum skúlunum?

3) Havandi útgerð og hølisviðurskifti í huga, kunnu útbúgvingarnar gerast bíligari við einum greiðum býti ella samskipan millum skúlarnar?

4) At enda verður landsstýrismaðurin í skúlamálum biðin um at greiða frá teimum politisku ætlanunum fyri báðar teir teknisku skúlarnar.

Svar:

ad 1): Talið á lærusáttmálum innan handverksøkið, har skúlagongdin er í Føroyum, er so lítið, at grundarlag er ikki fyri at býta handverkslærlingarnar millum 2 teknískar skúlar. Longu í 80- árunum, tá lærlingatalið var í hæddini, vóru llokkarnir í teknisku skúlunum smáir í flestu útbúgvingunum. Hetta sæst m.a. í teirri frágreiðing, sum er úrslitið av eini kanning, sum landsstýrið skipaði fyri av tekniska skúlanum í Tórshavn fyri fáum árum síðani. Seinri er hetta tal vorðið enn minni, so tað má metast at vera fíggjarliga óráðiligt at útbúgva handverkslærlingar í báðum teimum teknisku skúlunum.

Í skrivi frá landsstýrinum, dagfestum 28.06.1993, varð landsskúlafyrisitingin biðin um at boða Tekniska Skúlanum í Klaksvík frá, at allir handverkslærlingar í nevnda skúla skuldu flytast til Tekniska Skúlan í Tórshavn eftir summarfrítíðina 1993.
Um somu tíð hevði Tekniski Skúlin í Klaksvík fingið góðkent at fara undir HT-útbúgvingina. Avgerðin um, at allir handverkslærlingar skuldu fáa skúlagongdina í Tórshavn samsvaraði viðmerkingunum á løgtingsfíggjarlógini, har eisini stóð, at HF-skeiðið í Klaksvík skuldi flytast á Kambsdal.

Landsstýrið er framvegis av teirri áskoðan, at allir handverkslærlingar, sum skulu hava tá kravdu skúlagongdina á tekniskum skúla í Føroyum, skulu fáa hana í Tekniska Skúla í Tórshavn. Møguligur vøkstur í lærlingatilgongdini, búskaparlig framgongd í landinum ella broytingar í skúlaskipanini og útbúgvingartilboðum kunnu gera, at landsstýrið endurskoðar sítt sjónarmið.

ad 2): Orsakirnar til, at fleiri framhaldsútbúgvingar eru bodnar út, eru, at skúlamyndugleikarnir hava valt at ganga samfelagsligum tørvi á útbúgving á møti. Sjálvt um samfelagið nú er í kreppu, er neyðugt at útbúgva fólkið. Á tekniska økinum og øðrum við mega vit hava fólk, sum er búgvið til at taka upp tær avbjóðingar, sum framtíðin fer at seta til okkara. Í føroyska framtíðarsamfelagnum verða viðurskiftini onnur, enn tey eru í dag. Tá talan er um teknisku skúlarnar hevur landsstýrið tí víst á, m.a. yvir fyri teimum fíggjarjáttandi myndugleikunum, at tað er neyðugt at leggja framhaldandi útbúgvingarmøguleikar oman á SIT- og handverkslærlingaútbúgvingarnar - og í so stóran mun sum gjørligt at samskipa hesar møguleikar millum báðar teir teknisku skúlarnar.

HT-útbúgvingin í Klaksvík er eitt dømi um eina tekniskt-gymnasiala útbúgving, sum er eitt týdningarmikið lið í miðnámsútbúgvingum okkara.

Síðani koma so atstøðisútbúgvingarnar, sum geva atgongd til framhaldandi teknikaraútbúgvingar - og til maskinmeistaraútbúgving fyri næmingar, sum hava lokið maskinteknisku atstøðisútbúgvingina.

Vit hava tveir tekniskar skúlar í landinum. Hetta er ov nógv í mun til fólklatalið; men orsakirnar eru geografiskar og søguligar. Í fyrstu atløgu verður tí uppgávan at samskipa hesar útbúgvingar millum skúlarnar. Hetta má henda í positivari samvinnu millum skúlamyndngleikar, skúlar og áhugafeløg. Málið má vera, við skilagóðari ráðlegging at gera samvinnuna millum báðar skúlarnar so, at hvør skúli profilerar seg við teimum útbúgv- ingartilboðum og eyðkennum, sum gera, at vit úr einum yvirskipaðum sjónarmiði kunnu síggja ein felags bygnað, sum fevnir um tey teknisku útbúgvingartilboð, sum samfelag okkara hevur tørv á. Hetta kann gerast rationelt innan fyri karmarnar á báðum skúlunum. Hesum máli røkka vit einans við einari yvirskipaðari heildarráðlegging og tí samvinnu, sum umrødd er omanfyri.

ad 3): Tann konsulentrapportin, sum landsskúlafyrisitingin í august 1994 sendi landsstýrinum, og sum er gjørd av konsulentum frá danska undirvísingarmálaráðnum, lýsir væl teir teknisku skúlarnar. Við støði í henni ber til at síggja sterkar og veikar síður í báðum støðum. Hon kann vera partur av tí grundarlagi, sum arbeitt verður út frá. Annað er so fólkatal, næminga-/lærlingatilgongd, búskapur, geografisk viðurskifti, samskifti, metingar um framtíðartørv osfrv. Samanfatandi kann svarast upp á spurning 3, at sum heild kunnu útbúgvingar gerast bíligari við ráðlegging og samskipan, sum er grundað á teir faktorar, sum júst eru nevndir.

ad 4): Svarið liggur fyri ein part í tí, sum omanfyri er nevnt. Annars er at siga, at næmingar framvegis verða tiknir inn á SIT-útbúgvingina bæði í Tórshavn og Klaksvík. At skúlagongdin fyri handverkslærlingar bert fer fram í skúlanum í Havn, og at báðir skúlar framvegis taka upp næmingar til atstøðisútbúgvingarnar.

Skulu vit koma inn á nakað ítøkiligt innan karmarnar av einari ikki fjarari framtíð, so er nærliggjandi at hugsa sær, at skipað verður fyri einari matvørulinju í Tekniska skúlanum í Klaksvík.

Vit atliti at einum heildarsjónarmiði ber síðani til at hugsa sær, at um Tekniski Skúlin í Tórshavn skal hava víðkað undirvísingarvirksemi, so kann hesum skúla verða givið høvi til at fara undir ávísar útbúgvingar á teknikarastøði - til dømis útbúgvingar, sum kunnu hava samband við eina møguliga oljuvinnu.

Landsstýrismaðurin í skúlamálum hevur sett eina útbúgvingarnovnd, sum skal kanna, hvørjar avbjóðingar, ein møgulig oljuvinna fer at seta til útbúgvingarverk okkara. Vit hava stovnar, bæði innan fyrisiting og gransking, sum eiga at ganga inn í eitt samstarv, møguliga í millumtjóða sambandi, á oljuídnaðarøkinum.

Eisini føroyska vinnulívið hevur greitt landsstýrinum frá sínum áhugamálum í hesum viðurskiftum. Ábendingar eru komnar frá bæði granskingarstovnum, skúlum og vinnuni, og landsstýrið arbeiðir við at samskipa hesi sjónarmið, so at vit fáa eitt útbúgvingar- og

granskingarstøði, sum skal gera samfelagið og vinnulívið før fyri at taka ímóti teimum avbjóðingum, sum framtíðin fer at seta okkum.

100-15 Viðvíkjandi fundinum 23. januar 1995 við umboð fyri A. P. Møller o.o.

Ár 1995, týsdagin 14. februar boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Edmund Joensen, løgmann frá Vilhelm Johannesen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

23. januar hevði løgmaður fund við umboð fyri dousku stórfyritøkuna A. P. Møller, flogfelagið Mærsk Air og Frank Uhrenholt, nevndarformann í Føroya Fiskasølu. Um ørindi teirra í Føroyum hevur løgmaður sagt, at teir vildu spyrja, um møguleiki er fyri, at keypa føroyska flogfelagið Atlantsflog. Vísandi til niðanfyristandandi viðmerkingar, loyvi eg mær at spyrja løgmann, um donsku gestirnir ikki høvdu onnur ørindi í Føroyum, og hvørji hesi vóru?

Viðmerkingar:

Mánadagin 23. januar vóru umboð fyri donsku stórfyritøkuna A. P. Møller, danska flogfelagið Mærsk Air og nevndarformaðurin í Føroya Fiskasølu, Frank Uhrenholt, á fundi við løgmann.

Aftaná fundin, sum varð hildin í Tinganesi, vildi ongin kunna fjølmiðlarnar um, hvat varð viðgjørt á hesum fundi, og enn minni fekst nakað at vita um, hvørjar niðurstøður fundurin var komin til. Donsku gestirnir royndu at snúgva sær undan fjølmiðlafólkunum, og løgmaður vildi onki siga.

Allan týsdagin 24., mikudagin 25. og hósdagin 26. januar var tøgn. Teir, sum luttóku á fundinum vildu onki siga. Hetta førdi til, at ymiskar gitingar tóku seg upp - gitingar, sum gjørdu hendan loynifund enn meira áhugaverdan og forvitnisligan, bæði hjá okkum løgtingsmonnum, fjølmiðlunum og almenninginum.

Gitt varð, at ørindini m.a. vóru tey, at danska flogfelagið Mærsk Air var áhugað í at keypa føroyska flogfelagið Atlantsflog. Eisini varð gitt, at danska stórfyritøkan hevði áhuga í at keypa partabrøvini í Føroya Banka, ið nú hevur ment seg rættiliga væl aftaná partabrævaumbýti, bankasamanlegging og stórar almennar peningainnspræningar.

Somuleiðis varð gitt, at fundurin eisini snúði seg um eina ætlan, sum fevndi um tveir stórar tyrlupallar og fýra stórar tyrlur, ið skulu standa tilbúnar 24 tímar um samdøgrið. Annar tyrlupallurin skuldi verða í Klaksvík og hin á Tvøroyri. Tvær stórar tyrlur skuldu verða knýttar at pallinum í Klaksvík og tvær at pallinum á Tvøroyri.

Seinnapartin hósdagin 26. januar helt javnaðarflokkurin - tingmanningin og landsstýrismanningin - regluligan floksfund. Á tí fundinum reisti eg spurningin um loynifundin 23. januar yvirfyri landsstýrisumboðunum hjá javnaðarflokkinum. Eg greiddi frá teimum gitingum, ið eg hevði hoyrt um hendan fund, og sum eru umrøddar frammanfyri.

Eg fataði svarið frá landsstýrisumboðum javnaðarfloksins soleiðis, at løgmaður ógvuliga treyðugt hevði givið landsstýrinum eina frágreiðing um fundin, men at hann síðani hevði lagt lok á málið í tílíkan mun, at okkara landsstýrisumboð ikki hildu, at teir uttan víðari kundu kunna tingmanningina hjá javnaðarflokkinum um fundin.

Nú gjørdist málið uppaftur meira marghátligt og hugvekjandi. Sama kvøld sendi eg tí eitt bræv til Finnboga Arge, fíggjarnevndarformann, har eg bað um, at fíggjarnevndin skjótast gjørligt, og helst fyrrapartin dagin eftir boðsendi løgmanni til fundar í fíggjarnovndini, at greiða frá innihaldinum í teimum samráðingum, sum høvdu verið mánadagin 23. januar.

Fíggjarnevndarformaðurin gav mær ongantíð nakra tilsøgn um fund, men fyrrapartin fríggjadagin 27. januar fekk eg at vita frá Finnboga Arge, at løgmaður í tíðindasendingini hjá útvarpinum sama dag fór at siga almenninginum, hvat fundurin hevði snúð seg um. Í tíðindasendingini hjá útvarpinum varð sagt frá løgmanni, at ørindini hjá donsku gestunum í Tínganesi tann 23. januar, vóru ein fyrispurningur um møguleikan fyri at keypa Atlantsflog. Meira varð ikki sagt.

Hetta var eisini í tráð við eina av teimum trimum gitingunum, sum vóru frammi hesar dagarnar, og tí er orsøk at halda, at okkurt eisini hevur verið í hinum báðum gitingunum. Gitingin um tyrlupallarnar og tyrlurnar, ið skulu standa tilbúnar í Klaksvík og á Tvøroyri 24 tímar um samdøgrið, verður eisini væl undirbygd við ymiskum hendingum, sum farnar eru fram seinastu gott og væl tvey árini.

Í øllum teimum avtalum, sum eru gjørdar millum donsku ríkisstjórnina og føroyska heimastýrið hesi árini, verður skrivað og tosað um bygnaðarbroytingar. Talan er um bygnaðarbroytingar í fiskivinnuni, í skúlaverkinum, almannaverkinum og í heilsuverkinum. Á fiskivinnuøkinum fingu vit álitið frá bygnaðarnevndini og úrslitið av tí varð lógin um vinnuligan fiskiskap. Aftaná eitt av hesum samráðingarumførum, varð ein nevnd við donskum og føroyskum serfrøðingum sett við tí endamáli at gera álit um føroyska heilsuverkið.

Tað var danska heilsumálaráðið, ið setti serfrøðinganevnulina, sum læt álit frá sær í oktober 1993. Niðurstøðan í álitinum var sambært "Model A", at miðsavna so at siga alt virksemið á sjúkrahúsøkinum á einum sjúkrahúsi, nevniliga landssjúkrahúsinum. Har skuldi øll skurðviðgerðin fara fram. Tað sama varð sagt um heiligvág, og sum rosinan í pylsuendanum skuldu allar barnakonur í Føroyum flytast til Havnar fyri at fara á soppin.

Í danska uppskotinum til avtalu undir samráðingunum 12. oktober 1993 varð mælt til, at bygnaðarbroytingar skuldu gerast í føroyska heilsuverkinum, og at hesar bygnaðarbroytingar skuldu hava støði í álitinum frá "Rådgivningsgruppen vedrørende sundhedsvæsenet på Færøerne". Í hesi avtaluni var eisini ein lántøka frá danska ríkiskassanum til føroyska landskassan. Talan var um 1.530.000.000 kr. Løgtingsmálið um lántøkuna og avtalan millum ríkisstýrið og landsstýrið vórðu viðgjørd í fíggjarnevndini.

Fíggjarnevndin skrivaði felagsálit í hesum báðum málum. Ein meirilnti í fíggjarnevndini (Vilhelm Johannesen, Jóhannes Ellefsen, Jens Norðberg og Karl Heri Joensen) førir millum annað hetta fram: "Annars ger meirilutin vart við og undirstrikar, at bygnaðarbroytingarnar á heilsuøkinum, ið verða umrøddar undir punkt a í avtalui, ikki verða gjørdar við støði í álitinum frá "Rådgivningsgruppen vedrørende sundhedsvæsenet på Færøerne", soleiðis sum skotið varð upp í danska uppskotinum til avtalu.

Eisini í øðrum pørtum av avtaluni - eitt nú viðvikjandi kommunusamanleging - er ítøkiligur munur á danska uppskotinum til avtalu og tí endaligu avtaluni, sum varð gjørd á fundinum millum landsstýrið og stjórnina 12. oktober 1993. Meirilutin ger vart við og undirstrikar, at avtalan og ikki uppskotið til avtalu er galdandi, og at uppskotið heldur ikki eigur at nýtast sum tulkingargrundarlag."

Endurgevingin frammanfyri, er tikin úr felagsáliti í løgtingsmáli nr. 15/1993: Løgtingslóg um lántøku til landskassan og nr. 16/1993: Avtala millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri um endurfígging og kapitalinnskot í bankarnar v.m. Ein meiriluti í løgtinginum tók undir við meirilutanum í fíggjarnevndini. Sostatt er tað staðfest, at løgtingið eisini hevur tikið undir við, at bygnaðarbroytingar í heilsuverkinum ikki verða gjørdar við støði í áðurnevnda áliti.

Hesa seinastu tíðina hava vit hoyrt fleiri dømir um, at umboð fyri danskar stórfyritøkur, saman við almennum donskum embætismonnum og politikarum sita og leggja til rættis ymiskar ráðagerðir mótvegis Føroyum og føroyingum, uttan at føroyingar hava so mikið sum minsta ámælsi av hesum. Partabrævaumbýtið í bankunum og seinni samanleggingin av bankunum er eitt talandi dømi um slíka mannagongd frá danskari síðu. Og at danir als onga virðing hava fyri samtyktum Føroya løgtings, hava vit eisin talandi dømir um.

Øll hesi dømini eru sera hugvekjandi, og geva orsøk til, at gitt verður um ørindini hjá umboðunum fyri donsku stórfyritøkuna A. P. Møller, umboðunum fyri danska flogfelagið Mærsk Air og nevndarformanninum í Føroya Fiskasølu, Frank Uhrenholt,

í Føroyum og serstakliga í Tinganesi. Hetta er orsøkin til, at eg kenni tað sum eina skyldu at seta Edmundi Joensen, løgmanni hjálagda fyrispurning.

Við 28-0 atkvøðum varð 17. februar 1995 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

27. apríl 1995 svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

23. januar hevði løgmaður fund við umboð fyri donsku stórfyritøkuni A.P. Møller, flogfelagið Mærsk Air og Frank Uhrenholt, nevndarformann í Føroya Fiskasølu. Um ørindi teirra í Føroyum hevur løgmaður sagt, at teir vildu spyrja, um møguleiki er fyri at keypa føroyska flogfelagið Atlantsflog. Vísandi til niðanfyristandandi viðmerkingar, loyvi eg mær at spyrja løgmann, um donsku gestirnir ikki høvdu onnur ørindi í Føroyum, og hvørji hesi vóru?

Svar:

Háttvirdi løgtingsmaðurin Vilhelm Johannesen hevur sett mær fyrispurning við drúgvum viðmerkingum um óformellan fund í Tinganesi mánadagin 23. januar 1995. Hesin fundur kom í lag á tann hátt, at Frank Uhrenholt boðaði frá, at umboð fyri Mærsk Air komu til Føroya 22.-24. januar 1995 fyri ein grunn hjá A.P. Møller at kunna um teirra ætlanir at lata peningaligan stuðul til gransking og onnur mentanarlig endamál í Føroyum.

Løgmaður hevur sum málsøki umboðan og tekur tí ímóti nógvum gestum í Tinganesi. Hetta eru oftast kurteisisvitjanir, og tað er forvitnisligt at tosa við fólk um evni, tey hava kunnleika til og frætta teirra støðu.

Hetta høvi nýttu eisini umboðini hjá Mærsk Air og bóðu tí um ein kunnandi fund um ávís viðurskifti, sum høvdu teirra áhuga. Hetta var ein óformellur kunnandi fundur, her var eingin dagsskrá og eingin málsviðgerð, og tí vóru landsstýrismenn m.a. ikki við. Hevði nakað ítøkiligt komið fram annað enn kunnandi prát, so hevði tað sjálvandi verið viðgjørt og lagt til avgerðar, har avgerðir verða tiknar.

Vanligt er ikki eftir kunnandi fundir at koma við viðmerkingum til fjølmiðlarnar. Ein fortreyt fyri at fara í fjølmiðlarnar er, at landsstýrið hevur eini boð at bera, og at boðini eru búgvin. Í hesum førinum vóru fjølmiðlarnir kunnaðir, aftaná allir viðkomandi partar vóru tað. Tá og bert tástaðni vóru boðini búgvin at bera øðrum.

Nakað annað er, tá biðið verður um fund við løgmann ella landsstýrið um ítøkiligt mál við uppskotum ella framløgu av málum til støðutakan. Tá er mannagongdin ein onnur og vanlig málsviðgerð fer fram við fundarfrásøgn, niðurstøðum o.s.fr.

Eg kann svara háttvirda løgtingsmanni Vilhelm Johannesen, at nevndu donsku gestir

høvdu eingi onnur ørindi til mín.

100-16 Viðvíkjandi farloyvisgrunni

Ár 1995, fríggjadagin 17. februar boðuði tingformaðurin frá ovanfyristandandi fyrispurningi til Andrias Petersen, landsstýrismann frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Nær ætlar landsstýrið at seta í verk løgtingssamtykt um farloyvisgrunn?

Viðmerkingar:

Í apríl mánaða 1992 samtykti Føroya løgting við 26-0 atkvøðum, soljóðandi uppskot til samtyktar:
"Heitt verður á Føroya landsstýri um at leggja fyri Føroya løgting uppskot um stovnsetan av grunni, sum samskipar inn og útgjalding til tey starvsfólk, sum ikki fáa alla løn sína undir sjúku og/ella burðarfarloyvi frá tí almenna."

Í uppskotinum, sum var lagt fram av Terja Davidsen, løgtingsmanni, varð m.a. víst á, at sum støðan er viðvíkjandi gjaldi fyri løn undir sjúku og burðarfarloyvi er reiðiliga ójavnt, hvussu hetta rakar ymisk arbeiðspláss. Tímalønt fáa goldið av Almannastovuni. Alment sett fáa goldið frá tí almenna. Tey, sum eru lønt eftir S&K-sáttmála fáa ein part frá arbeiðsgevara. Onnur fáa alt goldið av arbeiðsgevara.
Henda skipan ger, at arbeiðspláss, sum hava mest kvinnur settar í starv, gjalda meir í farloyvisløn enn arbeiðspláss, har bert ella mest menn eru í starvi.

Uppskotsstillarin vísti eisini á, at galdandi skipanin hevur tann vansa at tá eitt virki skal seta fólk í starv er møgnleiki fyri, at menn verða tiknir fram um kvinnur av hesi orsøk - og att hetta fyri eitt lítið virki kann fíggjarliga verða ein spurningur um lív ella deyð.
Í viðmerkingum til uppskot um løgtingsfíggjarlóg 1992 gjørdi Almannastovan vart við, at skipanin eisini hevur ávirkan á almennar stovnar, og heitir á landsstýrið um at finna eina felagsskipan fyri almennar stovnar (ein grunn ella eina serstaka játtan, ið kann nýtast til endamálið at javna út trýstið av hesum á summum stovnum.)

Endamálið við uppskotinum var at tryggja, at endurgjaldið til løn undir sjúkra- og burðarfarloyvistíðini gjørdist meira javnt fyri virkini og tryggjaði, at eitt møguligt sjúkra ella burðarfarloyvi ikki kom at kollrenna tey fíggjarliga, og at tryggja, at gjald til starvsfólk undir sjúkra- ella burðarfarloyvi ikki førdi við sær, at kvinnur vórðu verri fyri enn menn, tá fólk vóru sett í starv.

Nú tá nærum tvey ár eru gingin síðan nevnda uppskot var samtykt, verður vónað, at hesin fyrispurningur kann skunda undir at samtyktin verður sett í verk.

Við 27-0 atkvøðum varð 23. februar 1995 samtykt, at fyrispuringurin skuldi svarast.

1. juni 1995 svaraði Andrias Petersen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Nær ætlar landsstýrið at seta í verk løgtingsløgtingssamtykt um farloyvisgrunn?

Svar:

Í seinastu sáttmálasamráðingunum við tey alment løntu kom inn í sáttmálarnar, at felags barnsburðargrunnur skuldi gerast innan tað almenna økið, soleiðis at útreiðslurnar til barnsburðarfarloyvi verða býttar javnt millum teir almennu stovnarnar, og soleiðis at teir stovnar, ið hava kvinnur í barnsburðaraldri, ikki verða órættvíst hart raktir fíggjarliga vegna barnsburðarfarloyvi.

4. mai 1995 bað landsstýrið dagpeningaskipanina á Almannastovuni um at gera kanningar og útrokningar um, hvussu nógv barnsburðarfarloyvi tað snýr seg um, sum ikki eru við í omanfyri nevndu skipan og dagpeningaskipanini, t.v.s. tey, ið eru á tí privata arbeiðsmarknaðinum og tey, sum ikki hava rætt til barnsburðarfarloyvi, t.v.s. tey heimaarbeiðandi og hvussu nógvan pening hetta snýr seg um, um dagpeningasatsurin varð nýttur.

Svar er ikki komið frá Almannastovuni um hetta, og tá svar kemur, verður arbeitt víðari við málinum, sæð út frá einum sosialum arbeiðsmarknaðarligum og búskaparligum sjónarmiði.

Nær og um farloyvisskipanin verður víðkað kann tí ikki svarast neyvari nú.

100-17 Viðvíkjandi tolleftirlitinum á flogvøllinum

Ár 1995, hósdagin 23. februar boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g n r

I. Ætlar landsstýrið at góðkenna, at 3 - 4 størv verða niðurløgd á Toll- og skattstovuni í Vágum?

II. Um so er, hvørja ávirkan kemur hetta at hava á narkoeftirlitið á flogvøllinum og fyri arbeiðið annars á deildini í Vágum?

Viðmerkingar:

Nú tað ljóðar, at heili 3-4 størv skulu niðurleggjast á Toll- og Skattstovuni í Vágum, vil ein seta sær spurningin, hvussu hetta kemur at ávirka tolleftirlitið á flogvøllinum.

Tey seinru árini hevur nógv verið tosað um týdningin av tiltøkum til tess at minka um rúsevnisvandan í einum samfelag. Ein táttur av hesi "verkætlan" hevur verið at herða eftirlitið við landamørk og soleiðis ið hvussu so er fáa fatur í parti av tí rúsevni, ið annars var komið til lands.

Hvat geografisku støðu Føroya viðvíkur, kann í so máta sigast, at eftirlitstiltøk avgjørt hava alstóran týdning og eru alneyðug til tess - í stóran mun - at fyribyrgja, at skaðilig rúsevni verða flutt til landið.

Hvat ferðafólkaflutningi viðvíkur, so er tað ein sannroynd, at meginparturin av teimum ferðandi, ið koma uttaneftir, koma loftvegis.

Hetta hevur so við sær, at tolleftirlitið á flogvøllinum hvønn dag í árinum hevur nógvar avgreiðslur um hendi umframt tann týðandi, neyðuga leiklut at ansa eftir, at m.a. narkotisk evni, ið verða flutt til landið, ikki koma brúkarum í hendi.

Einki at ivast í, at eitt neyvt tolleftirlit eisini hevur eitt týðandi árin, ið fyribyrgir, at royndir verða gjørdar at flyta hesi skaðiligu evni til landið.

Tað vildi verið skeivt og roynst sum løtuvinningur at slaka í eftirlitinum á hesum øki.

Politiskt vildi tað verið ábyrgdarleyst.

Tí er at vóna, at landsstýrið ikki loyvir skerjingum, sum koma at avmarka nevnda

eftirlit og føra við sær, at lættari gerst at innflyta slík evni, sum hava roynst mongum einstaklingum og samfeløgum sum ein sonn plága.

Við 26-0 atkvøðum varð 9. mars 1995 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

20. apríl 1995 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrið at góðkenna, at 3-4 størv verða niðurløgd á Toll- og Skattstovuni í Vágum?
2. Um so er, hvørja ávirkan kemur hetta at hava á narkoeftirlitið á flogvøllinum og fyri arbeiðið annars á deildini í Vágum?

Svar:

Toll- og Skattstovan hevur ætlan um at niðurleggja tvey størv á deildini vesturi í Vágum, so talan er ikki um tey trý til fýra størvini, sum Tordur J. Niclasen, løgtingsmaður, vil vera við.

Tá ein stovnsleiðsla metir, at stovnurin hevur ov nógv fólk í arbeiði, so vildi tað verið løgið av landsstýrinum at hildið fast um eitt ávíst starvsfólkatal, tí tað er m.a. uppgávan hjá eini stovnsleiðslu at meta um, um starvsfólkatalið er hóskandi ella ikki.

Tá talan er um tænastumenn, skal landsstýrið góðkenna ætlanina. Hetta mál er enn bert viðgjørt umsitingarliga sambært §§ 28 og 29 í tænastumannalógini, men verður í seinasta enda lagt fyri landsstýrið til støðutakan.

Eg kann ikki her og nú siga, hvørja støðu landsstýrið kemur til, men hin vegin er tað greitt, at skal landsstýrið sýta leiðsluni á Toll- og Skattstovuni at siga fólki upp, sum hon ikki metir seg hava brúk fyri, so mugu nakrar veruliga tungar grundgevingar finnast.

Annars kann upplýsast, at nøkur starvsfólk á Toll- og Skattstovuni í Vágum hava gjørt vart við seg. Tey meta hesa niðurlegging av størvum vera sera óhepna fyri stovnin og serliga fyri narkoeftirlitið. Sama hevur eisini sýslumaðurin í Vágum skrivliga fört fram, hóast hetta málsøkið er yvirtikið mál, sum landfútin ikki hevur nakra sum heist ávirkan á.

Síðani verður spurt, hvørja ávirkan niðurleggingin av størvunum kann fáa fyri narkoeftirlitið og arbeiðið annars á Toll- og Skattstovuni í Vágum.

Toll- og Skattstovan sigur, at henda avgerð teirra í sær sjálvum ikki hevur nakra serliga ávirkan á narkoeftirlitið á flogvøllinum. Víðari verður sagt, at Toll- og Skattstovan arbeiðir við tiltøkum, ið koma at styrkja narkoeftirlitið, ikki bert á flogvøllinum, men

um alt landið. Hetta verður gjørt m.a. við:

- Lutfalsliga størri partur av orkuni verður bendur beinleiðis ímóti narkoeftirliti.
- Broytingar skulu gerast í arbeiðsgongdunum, soleiðis at narkoeftirlitið eisini á tann hátt verður styrkt.
- Skipað verður fyri skeiðum í narkoeftirliti fyri tollarar.
- Sambandið við tolleftirlitini í grannalondunum verður útbygt.

Nevnast kann síðani, at tá stovnarnir Føroya Tollstova, Tolleftirlitið og Líkningarráð Føroya vórðu lagdir saman í ein stovn, høvdu allar tríggjar eindirnar í Vága Øki lutfalsliga stóra manning, meðan tað øvugta gjørdi seg galdandi aðrastaðni í landinum. Hetta er bæði sambært útrokningum og metingum, ið ráðgevarafelagið Deloitte & Touche gjørdi í samband við samanleggingina av stovnunum, og eisini sambært útrokningum og metingum, sum leiðslan á Toll- og Skattstovuni sjálv gjørdi.

Áðrenn Atlantsflog byrjaði at flúgva, vórðu fýra tollarar í starvi í Vága Floghavn, men eftir at Atlantsflog var byrjað at flúgva, og fráferðin var tíðliga um morgunin, og ikki var komið aftur fyrr enn seint um kvøldið, vórðu tveir tollarar settir aftrat við tolleftirlitið í Vágum. Viðmerkjast skal tó, at flogtíðirnar nú aftur eru broyttar.

Ætlanin er, at tað framyvir skulu vera 8 3/4 normering í Vága Øki. 4 fólk koma at hava tollarayrkið sum primeru uppgávuna, meðan áini koma at luttaka í tollarbeiði í tann mun, tað er tørvur á tí.

Við hesum svari meti eg, at fyrispurningurin er svaraður, men eg undirstriki enn einaferð, at málið hevur ikki fingið nakra politiska viðgerð.

100-18 Viðvíkjandi skeljaveiðu, havbotninum og øðrum veiðihættum

Ár 1995, hósdagin 23. februar boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Ivan Johannesen, landsstýrisman frá Jákupi Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Hvat siga tær føroysku kanningarnar, og hvat siga tær útlendsku kanningarnar, sum gjørdar eru av havbotninum, um ta ávirkan, sum skeljaveiða við stórum dreggjum hevur á botnin og lívið á botninum?

Hvussu vil landsstýrið tryggja sær, at útróðrarmenn ikki verða trokaðir burtur av ætlaðu trolingini eftir skeljum norðanfyri og eystanfyri?

Viðmerkingar:

Hin 31. januar 1990 legði Kristiligi Fólkaflokkurin fram uppskot á ting um kanningar í samband við skeljaveiðu, løgtingsmál nr. 70/1989.

Hin 5. apríl legði Kristiligi Fólkaflokkurin aftur fram uppskot um kanningar í samband við skeljaveiðu.

Uppskotið fekk 9 atkvøður fyri, men meirilutin í fiskivinnunevnd løgtingsins upplýsti tá, at "landsstýrið arbeiddi við málinum, og at meirilutin hevði fingið at vita frá landsstýrinum, at eingi fiskiloyvi verða givin til skeljaveiðu norðanfyri, fyrrenn neyðugar kanningar eru gjørdar."

Samtíðis vísti tann sami meiriluti í fiskivinnunevnd løgtingsins tá á, hvør ið niðurstøðan hjá norskum vísindamonnum var viðvíkjandi skeljaveiðu, at "stór botnøki liggja oyðin nógv ár framyvir".

Tá ið Niels Pauli Danielsen hin 4. november 1992 setti fram fyrispurning viðvíkjandi veiðu eftir jákupsskel og kanningum av havbotninum og endurtók henda fyrispurning hin 15. februar 1994, svaraði landsstýrið, at "Fiskirannsóknarstovan skipaði fyri kanningum av havbotninum við sjókaga á skeljaleiðunum eystan fyri Nólsoynna í 1988 og í 1989 á økjunum eystanfyri og norðanfyri. Eisini vóru myndir tiknar á havbotninum, har sum skeljadreggj vóru nýtt. Kanningin gav ikki beinleiðis ábending um, á hvønn hátt skeljafiskiskapurin ávirkar annan fiskiskap á somu leiðum ella gýtingarstovnin hjá øðrum fiskasløgum."

Sagt varð, at kanningarnar skuldu halda fram.

Hin 17. apríl 1991 handaðu umboð fyri Klaksvíkar Útróðrarfelag løgtingi og landsstýri 1784 undirskriftir ímóti skeljaveiðu. Tá varð skeljaveiðan norðanfyri slept nøkur ár, og eingin talaði meir um tað, fyrrenn tað nú um árskiftið frættist, at landsstýrið arbeiddi við at geva einum skipi afturat loyvi til skeljaveiðu, og at hetta skip skuldi royna eftir jákupsskel norðanfyri á leiðunum, har "Fame" í síni tíð lá og grópaði og velti botnin.

Vísast kann til mótmælini frá útróðrarmonnum, sum halda, at botnurin eystanfyri er broyttur so nógv, at fiskurin er ikki hin sami har, nú ið "Norðheim" tey seinastu nógvu árini hevur havt loyvi til at roynt eftir jákupsskel allastaðni eystan fyri Nólsoynna.

Uppskot landsstýrisisins er sent Fiskivinnustarvsnevndini, sum mælir frá at økja um talið av skipum, ið royna eftir jákupsskel.

Við 24-0 atkvøðum varð 9. mars 1995 samtykt, at fyrispuringurin skuldi svarast.

20. apríl 1995 svaraði Ivan Johannesen, landsstýrismaður fyrispuringinum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Hvat siga tær føroysku kanningarnar, og hvat siga tær útlendsku kanningarnar, sum gjørdar eru av havbotninum, um ta ávirkan, sum skeljaveiða við stórum dreggjum hevur á botnin og lívið á botninum?

Hvussu vil landsstýrið tryggja sær, at útróðrarmenn ikki verða trokaðir burtur av ætlaðu trolingini eftir skeljum norðanfyri og eystanfyri?

Svar:
Eg skal svara háttvirda tingliminum Jákupi Olsen aftur, at landsstýrið hevur kannað hetta mál bæði væl og virðiliga. Summum ber til at svara rættuliga gjølla, annað vita vísindamenn ikki nóg nógv um til at geva nakað endaligt svar nú.

Sum vanligt má landsstýrið fyrst tryggja, at veiðan ikki gongur stovninum ov nær. Tað hevur í fleiri ár verið greitt, at møguleikar eru at gagnnýta skeljar norðanfyri, so at hetta kann gerast ein burðardygg vinna, lívfrøðiliga og búskaparliga, við einum íkasti til føroyskan búskap, sum vit hava harðliga fyri neyðini í hesum tíðum.

Spurt verður síðani, um landsstýrið hevur tryggjað sær, at útróðrarmenn ikki verða trokaðir burtur av, at dreggjað verður eftir jákupsskel norðanfyri og eystanfyri. Tað er mín sannføring, at tað ber til at leggja henda fiskiskap so til rættis, at hann ikki er til ampa fyri útróðrarmenn. Talan er um bert eitt skip við avmarkaðari veiðiorku. Tað vil so vera í hesum spurningi, sum í so nógvum øðrum fiskivinnuspurningum, har ávísir bátabólkar hava ymisk áhugamál, kann stríð standast av, hvør hevur besta rættin at nýta eina leið. Landsstýrið má í tílíkum førum leggja til grund at fáa samfelagsbúskaparliga

mest burtur úr, samstundis sum rættindini hjá teimum, sum hava røkt hesar leiðir, ikki verða gingin ov nær.

Er tað lætt at svara hesum, so er truplari at geva eitt endaligt svar uppá spurningin um, hvørja ávirkan dregg hava á botnin. Tað ber væl til at nýta útlendskar kanningar. Í Barentshavinum t.d. er talan um eitt annað slag av skel, sum veksur væl seinni enn okkara. Eisini vóru tey skip og dregg, sum vórðu nýtt har, nógv størri enn tað, sum talan er um at loyva norðanfyri. Eisini veldst um botnin og tey dýrasamfeløg, sum eru partar av vistskipanini. Er talan um sandbotn ella um botn við meira gróðri? Er annar reiðskapur ella annað virksemi, sum ávirkar botnin?

Fiskirannsóknarstovan hevur tikið myndir við sjókaga av dreggi, sum gongur eftir botninum í veiði eftir jákupsskel undir Føroyum. Tað sæst, at dreggið ikki grópar niður í botnin. Tó ávarar Fiskirannsóknarstovan móti at dreggja á grynri vatni (undir 30 fv.) og inni á firðum og sundum, tí her má roknast við, at dregg hevur stóra ávirkan á tær vistskipanir, sum eru har.

Ein bólkur undir ICES hevur í apríl 1994 viðgjørt spurningin um árinið frá fiskireiðskapi á vistskipanir í Norðsjónum. Tilfar var ikki til nakra endaliga niðurstøðu, men bólkurin skeyt upp at steingja øki í Norðsjónum og hava tey til samanberingar við øki, har nógv verður fiskað t.d. við bummtroli, sum grópar botnin. Eldri kanningar úr Skagerakk hava ikki ávíst mun millum øki, har nógvur fiskiskapur var og samsvarandi øki, har ikki varð fiskað, men tá hesar kanningar vóru gjørdar, var veiðitrýstið ikki so stórt sum nú.

Ein niðurstøða er tó, at allur fiskiskapur hevur ávirkan bæði beinleiðis við at taka burtur úr ávísum stovnum fisk, sum annars hevði livað og ávirkað vistskipanina, og óbeinleiðis við at ávirka botnin ella onnur viðurskifti. Endamálið hjá landsstýrinum er at finna fram til loysnir og samskipan av fiskiskapi, har vinnan hjá øllum á sjónum er burðardygg og kann vera eitt trygt grundarlag undir virkseminum árini framyvir.

100-19 Viðvíkjandi kanningini av møguleikunum fyri aktivering av avsettum peningi at lætta um fíggjarstøðuna hjá sethúsaeigarunum

Ár 1995, týsdagin 18. apríl boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Andrias Petersen, landsstýrismann frá Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Føroya Løgting álegði 22. nov. 1994 landsstýrinum, áðrenn 1. mars 1995, at leggja fyri tingið úrslitið frá kanning, hvussu avsettur peningur móti tapi í sethúsaskuld kann aktiverast fyri at lætta um fíggjarstøðuna hjá sethúsaeigarunum.

1) Hvussu langt er hetta kanningararbeiðið komið?

2) Hvat er komið burtur úr higartil?

3) Nær verður úrslitið lagt fyri Føroya Løgting?

Viðmerkingar:

Sum úrslit av uppskoti Fólkafloksins nr. 13/94: Aktivering av avsettum peningi móti tapum í sethúsaskuldini, setti ein samd fíggjarnevnd 10. nov. 1994 fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

Føroya Løgting heitir á landsstýrið at kanna, hvussu peningur, sum Føroya Banki hevur avsett móti tapi í sethúsaskuld, kann aktiverast fyri at lætta um fíggjarstøðuna hjá sethúsaeigarunum.

Úrslitið av kanningini skal leggjast fyri løgtingið áðrenn 1. mars 1995.

22. november 1994 varð uppskotið samtykt við 25 - 0 atkvøðum.

Tey eru mong, sum við vón og spenningi hava bíðað eftir úrslitinum av kanningini um møguleikan at lætta um fíggjarstøðuna hjá sethúsaeigarunum.
Vísandi til áhaldandi fráboðanirnar um tvingsilssølur, er fíggjarliga støðan hjá húsarhaldunum onki broytt til tað betra seinastu mánaðirnar.
Tað er eyðsýnt, at sambandið millum fíggjarorkuna hjá einstaklinginum og møguleikarnir hjá stórum pørti av vinnuni at halda uppi neyðuga peningarenslinum, er ein av fortreytunum fyri, at lunnar aftur kunnu leggjast undir framburð í landinum.

Eisini er tað ein sannroynd, at hóast milliardir eru fluttar til samfelagið seinastu árini, er onki av hesi upphædd endað í umfari í vinnuni og harvið millum manna.
M.a. tí livir fjøld av virkisfúsna fólkinum í landinum undir so fíggjarligum trongum korum, at ógjørligt er at svara hvørjum sítt.

Tað er tí undranarvert, hvussu lítlan prioritet hesin veruleiki hevur millum teir ráðandi og í bankanum.

Nú vit fyri vikum síðani hava rundað framløgudagin fyri kanningini (1. mars) og onki enn er komið í ljósmála, eigur landsstýrismaðurin í fbúðarmálum at greiða tinginum frá, nær úrslitið fyriliggur, og hvat higartil er spurt burturúr kanningararbeiðinum.

Víst verður annars til viðmerkingarnar í uppskoti Fólkafloksins nr. 13/1994.

Við 20-0 atkvøðum varð 20. apríl 1995 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

Ikki svaraður.

100-20 Viðvíkjandi Føroyabólkinum ("Færøgruppen")

Ár 1995, týsdagin 18. apríl boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Bent Klinte, ríkisumboðsmann frá Finnboga Ísakson, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

1) **Hvørjir limir, fastir ella skiftandi, eru í Føroyabólkinum ("Færøgruppen")?**
2) **Nær hevði hesin bólkur sín fyrsta fund?**
3) **Hvussu nógvir fundur hava verið í hesum bólki higartil og nær?**
4) **Hvørji mál hava verið til viðgerðar á teimum einstøku fundunum, og hvørjar niðurstøður eru gjørdar?**

Viðmerkingar.
Teir seinastu mánaðirnar hava føroyskir og danskir fjølmiðlar útvegað upplýsingar um mangt og hvat í viðurskiftunum Føroya og Danmarkar millum, sum føroyski

almenningurin ikki hevur vitað um. Líkt er til, at landsstýri og Løgting heldur ikki hava vitað um mangt av tí, sum er komið fram.

Gjøgnum árini hevur verið fløt fram, at viðurskiftini landanna millum undir heimastýrinum bygdu á smámillum álit, tvs. at partarnir boðaðu hvørjum øðrum frá tí, sum á einhvønn hátt kundi hava áhuga fyri hin partin. Sum dømi um hesa fráboðan kann nevnast, at vanligt hevur verið, at umboð fyri eitt nýskipað landsstýri eru farin til Danmarkar at greiða stjórnini frá tí politikki, sum ætlanin var at føra. Annað dømi er, at ríkisumboðsmaðurin, sum umboð í Føroyum fyri ríkisstjórnina, hevur fingið fráboðan um tað, sum er samtykt á landsstýrisfundi.

Er tað rætt, sum er komið fram í fjølmiðlunum, er talan um, at danska stjórnin grovliga hevur brotið hesi álitis- og fráboðanarviðurskifti millum londini. Sumt av hesum fæst neyvan upplýst til fulnar, fyrr enn ein komandi dómarakanning av partabrævaumbýtinum millum Føroya Banka og Sjóvinnubankan 22. mars 1993 og av bankabjargingunum sum heild er liðug.

Men í einum føri má haldast, at Føroya fólk, Føroya Landsstýri og Føroya Løgting hava krav uppá at fáa eina frágreiðing beinanvegin. Tað er um tíðindini um, at í Danmark er ein Føroyabólkur, ein sokallað "Færøgruppe", sum - eftir tí, ið er komið fram - hevur havt fundir, har framtíðar viðurskifti í føroyska samfelagnum hava verið viðgjørd og løgd til rættis, uttan at føroyingar og eftir øllum at dømna føroyskir myndugleikar hava vitað av hesum. Sambært tíðindunum hava fleiri danskar ráðharrastovur og haraftrat ma. Fíggjareftirlitið umboð í hesum bólki.

Út frá hesum seti eg ríkisumboðsmanninum nakrar spurningar, sum eg rokna við at fáa greitt svar uppá innan tað frest, sum tingskipanin fyriskrivar.

Við 20-0 atkvøðum varð 20. apríl 1995 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

4. mai 1995 svaraði Bent Klinte, ríkisumboðsmaður fyrispurninginum soleiðis:

Forespørgslen lyder således:

1) Hvilke medlemmer, faste eller skiftende, er der i Færøgruppen?

2) Hvornår havde denne gruppe sit første møde?

3) Hvor mange møder har der været i denne gruppe indtil nu, og hvornår har møderne været afholdt?

4) Hvilke sager har været til behandling på de enkelte møder, og hvilke konklusioner er man nået til?

Besvarelse:
Under henvisning hertil kan jeg oplyse følgende:

Betegnelsen "Færø-gruppen" er blevet anvendt som betegnelse for de embedsmænd, der har deltaget i møder i forbindelse med den økonomiske krise på Færøerne. "Færø-gruppen" har ikke bestået af nogen fast personkreds, idet deltagelsen har været afhængig af de problemstillinger, der er blevet drøftet. "Færø-gruppen" har således involveret embedsmænd fra Statsministeriet, Økonomiministeriet, Industriministeriet, Finansministeriet, Finanstilsynet, Danmarks Nationalbank og Finansieringsfonden af 1992. Gennem tiden er deltagerkredsen blevet reduceret til de nævnte ministerier.

Møderne om den økonomiske krise på Færøerne har været afholdt efter behov og med skiftende deltagelse. Der foreligger ikke nogen liste over møderne i "Færø-gruppen" alene af den grund, at det i mange tilfælde ville være svært at afgøre, om det var "Færø-gruppen", der var samlet.

Møderne i "Færø-gruppen" med deltagelse af de ministerielle embedsmænd har blandt andet dannet grundlag for indstillinger til brug ved den politiske beslutningsproces i forbindelse med de indgåede aftaler mellem regeringen og landsstyret.

Jeg kan i øvrigt henvise til de svar, som statsministeren har givet til Folketingets Politisk-Økonomiske Udvalg den 15. marts og den 24. marts 1995.

100-21 Lógin um etiskt ráð og regulering av biomedisinskari gransking

Ár 1995, mánadagin 24. apríl boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Óla Jacobsen, landsstýrismann frá Lassa Klein, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Nær fer landsstýrið at fylgja løgtingssamtyktini frá 22. apríl 1994 og leggja fyri løgtingið uppskot til samtyktar um ígildissetan fyri Føroyar av lóg nr. 353 frá 3. juni 1987 "om oprettelse af et etisk råd og regulering af visse biomedicinske forsøg"?

Viðmerkingar

Kristiligi fólkaflokkurin hevur 2 ferðir lagt fyri løgtingið uppskot til lóg um etiskt ráð og reguleringar av biomedisinskari gransking.

Seinnu ferðina samtykti løgtingið við 19 atkvøðum eina áheitan á landsstýrið um at leggja uppskot til samtyktar hesum viðvíkjandi fyri løgtingið.

Við teirri framkomnu tøkn, vit í dag ráða yvir, gerst tað neyðugt at seta greiðar reglur, ið verja menniskja og varðveita virðingina fyri tí einstaka.

Í Danmørk hevur fólkatingið tí samtykt eina lóg um etiskt ráð, sum er í samsvar við ta kristnu mannaáskoðanina.

Endamálsgreinin í lógini er soljóðandi: "Ráðið skal í virki sínum byggja á ta fortreyt, at mannalív byrjar í gitingini."

Lógin um etiskt ráð frá 1987 er enn ikki sett at galda í Føroyum, sjálvt um løgtingið hevur samtykt at taka undir við ST-sáttmálanum frá 20. novembur 1989, ið sigur: "at barnið vegna likamligt og sálarligt óbúni hevur tørv á serligari vernd og umsorgan, bæði fyri føðing og eftir føðing, herundir eisini hóskandi løgfrøðiliga verju."

Nú eru tað ikki allar danskar kunngerðir og lógir, vit eiga at skunda okkum at fáa settar í verk í Føroyum, men her er talan um eina lóg, sum er í samljóð við gamlan kristnan og føroyskan sið, og sum tí eigur at verða sett í gildi her í Føroyum skjótast gjørligt.

Við 23-0 atkvøðum varð 27. apríl 1995 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

1. juni 1995 svaraði Andrias Petersen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Nær fer landsstýrið at fylgja løgtingssamtyktini frá 22. apríl 1994 og leggja fyri løgtingið uppskot til samtyktar um ígildissetan fyri Føroyar av lóg nr. 353 frá 3. juni 1987 "om oprettelse af etisk råd og regulering af visse biomedicinske forsøg"?

Svar:

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 100-21/1994: Fyrispurningur frá Lassa Klein, løgtingsmanni, til Óla Jacobsen, landsstýrismann, viðvíkjandi lóg um etiskt ráð og regulering av biomedisinskari gransking.

Við løgtingssamtykt frá 22. apríl 1994 var tað álagt landsstýrinum at leggja uppskot fyri løgtingið um ígildissetan í Føroyum lóg um etiskt ráð og lóg um biomedisinska gransking.

Tað framgongur í løgtingssamtyktini, at ígildissetan av lógini ikki skal hava við sær umsitingarligar útreiðslur, ella at eitt (serstakt føroyskt) ráð verður sett á stovn.

Ríkisumboðið sendi í august 1994 landsstýrinum tilfar frá Heilsustýrinum viðvíkjandi etiska ráðnum og biomedisinskari gransking.

Landsstýrið bað síðani í januar 1995 landslæknan, sjúkrahússtjóran og Læknafelag Føroya um teirra viðmerkingar til ígildissetan av lógunum, og somuleiðis bað landsstýrið um uppskot um, hvussu hetta best kann skipast í tráð við samtykt Løgtingsins frá 22. apríl 1993.

Landsstýrið hevur ikki enn fingið øll ummælini. Tá hesi fyriliggja, fer landsstýrið við støði í viðmerkingunum og uppskotunum í ummælunum, at skjóta upp tær tillagingar í lógunum, sum kunnu verða neyðugar orsakað av serligum føroyskum viðurskiftum. Tá hetta er greitt, verður málið lagt fyri løgtingið til støðutakan og góðkenningar.

100-22 Um møguleikar hjá Føroyum at fáa part av tí gjaldi, ið flogfør rinda, sum flúgva í føroyskum loftrúmi, og um møguleikarnar hjá føroyingum at átaka sær eftirlitið við flogferðsluni í føroyska loftrúminum

Ár 1995, mánadagin 24. apríl 1995 boðaði tingformaðurin frá omanfyristandandi fyrispurningi til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann frá Signari á Brúnni, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

F y r i s p u r n i n g u r

Viðmerkingar

Undanfarna landsstýrið reisti spurningin um møguleikar hjá Føroyum at fáa part av tí gjaldi, ið flogfør rinda, sum flúgva í føroyskum loftrúmi, og um føroyingar kundu átikið sær at havt eftirlitið við flogferðsluni í føroyskum loftrúmi.

Nevnd varð sett til tess at kanna málið gjøilari.

2. juni í 1994 lat nevndin úr hondum frágreiðing um nevnda mál. Mangar áhugaverdar upplýsingar vórðu fingnar til vega, ið m.a. bendu á, at føroyingar skuldu átt møguleikar til tess at fingið nakað burturúr flogerðsluni fíggjarliga, ið er í føroyska loftrúminum.

Harumframt skuldu møguleikar verið hjá føroyingum at kunna átikið sær at havt eftirlit við flogferðsluni í tí føroyska loftrúminum, og harvið vórðu fleiri arbeiðspláss skapt í landinum, ið alstórur tørvur er á.

Nevndin vísti á, at í 1956 varð avtala gjørd um felags fígging av ávísum loftferðslutænastum í Íslandi og eru 22 lond partar av avtaluni.

Ísland hevur bundið seg til at veita flúgvileiðaratænastu, meteorologiska tænastu og loftferðslu - og meteorologiskar samskiftistænastur fyri flogfør, ið fara yvir Norðuratlantshavið norðan fyri 45. breiddarstigi. 37 flúgvileiðarar og 105 fólk tilsaman starvast í Íslandi í samband við veitanina av nevndu tænastum.

Flogførini, ið flúgva í íslendska ábyrgdarøkinum, eru um 60.000 um árið, harav størsti parturin fer um føroyskt loftrúm. Hvørt flogfar rindar fast gjald fyri at flúgva um íslendska/føroyska økið, ið verður goldið íslendingum, ið hava eftirlitið.

Sama er galdandi í øðrum økjum. Nevnast skal, at gjaldið ið verður latið dønum og norðmonnum fyri at ferðast um teirra loftrúm, er munandi hægri enn tað, ið verður latið íslendingum.

Føroyska flogfarið, ið flýgur yvir íslendskt/føroyskt, danskt og norskt loftrúm, rindar

árliga stórar upphæddir í loftrúmsgjaldi. Tilskilast skal, at felagið rindar einki til íslendingar, men bert til norðmenn og danir.

Undanfarna landsstýrið, ið hevði tikið málið upp til viðgerðar, hevði sett sær fyri, at venda sær til donsku myndugleikarnar, við ynski um at fremja broytingar í, so føroyingar fingu møguleikar fyri at fáa inntøkur burturúr sínum loftrúmi, eins og aðrir, samstundis sum teir sjálvir átóku sær at hava eftirlitið.

Undanfarna landsstýrið legði frá sær í ótíð, og náddi tí ikki at loysa málið til fulnar.

Í hetta skuldi verið eitt stórt og týdningarmikið mál, ið sitandi landsstýrið skuldi hildið fram at arbeitt við. Lítið og einki hoyrist um hetta mál, og tí verða hesi fyrispurningar settir landsstýrismanninum í samferðslumálum:

1. Arbeiðir landsstýrið framhaldandi við umrødda máli ?

2. Hevur landsstýrið havt samband við donsku ríkismyndugleikarnar, til tess at fáa greiðu á nevnda máli ?

3. Nær kann væntast at úrslit spyrst burturúr ?

Við 22-0 atkvøðum varð 27. apríl 1995 samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

1. juni 1995 svaraði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Arbeiðir landsstýrið framhaldandi við umrødda máli?
2. Hevur landsstýrið havt samband við donsku ríkismyndugleikarnar, til tess at fáa greiðu á nevnda máli?
3. Nær kann væntast at úrslit spyrst burturúr?

Svar:

ad 1. Landsstýrið hevur ikki slept ætlanum um at arbeiða fyri at føroyingar kunnu fáa part av inntøkunum fyri yvirflúgving gjøgnum føroyskt loftrúm, men er ikki liðugt við fyrireikingararbeiðið, sum er neyðugt í hesum sambandi.

ad 2. Landsstýrið hevur ikki havt samband við donsku ríkismyndugleikarnar, til tess at fáa greiðu á hesum máli. Víst verður til grundgevingarnar undir pkt. 1.

ad 3. Við tað at útlendskir myndugleikar hava avgerðarrættin í hesum máli, ber ikki til at svara hesum spurningi nágreiniliga.

RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22


6